Løgtingstíðindi 1988 – Ískoyti

Avskrivaði orðaskilti. Bert lítil partur av orðaskiftinum hetta árið er avskrivaður.

Tingfundur settur 29. juli 1988.

Formaðurin

Soljóðandi skriv er í dag sent øllum løgtingsmonnum:

"Eftir grein 7 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mei 1948 um stýrisskipan í sermálum ger løgmaður kunnugt, at løgtingið kemur saman til ólavsøkuting fríggjadagin, 29 juli 1988, kl. 13°° og boðsendir við hesum øllum tingmonnum at koma til tings.

Sagt verður frá hesum.
Atli P. Dam, løgmaður".

Eg skal síðani lýsa tingið, ólavsøkutingsetuna 1988 at vera setta.

Hjástaddar her í dag eru tvær norðurlendskar sendinevndir, ein úr Grønlandi við landsstýrisformanninum Jonathan Motzfelt og landsstýrismanninum Kaj Egede og úr Íslandi Thorsteinn Pálsson, forsætisráðharra, og vit bjóða teimum við fylgjum teirra at verða vælkomnum her í løgtingið í samband við setanina av ólavsøkutinginum.

Eg skal síðan biðja Sverra Midjord og Flemming Mikkelsen um at verða fyribils tingskrivarar.

Fyrst á skránni er val av formansskapi. Uppskot, Signar Hansen: Hergeir Nielsen, uppskot um fyrsta næstformann, Pauli Ellefsen: Agnar Nielsen, uppskot um annan næstformann, Tórálvur Mohr Olsen, og uppskot um triða næstformann, Jógvan Sundstein.

So er formansskapurin valdur og har eru:

formaður Hergeir Nielsen,

1. næstformaður Agnar Nielsen.

2. næstformaður Tórálvur Mohr Olsen

3. næstformaður Jógvan Sundstein

So skal tað verða val av tveimum skrivarum. Uppskot um skrivara:

Jørgen Thomsen: Sverri Midjord

Og uppskot um 2. skrivara:

Pauli Ellefsen: Flemming Mikkelsen.

Síðan eru skrivararnir valdir, og teir eru:

Sverri Midjord, 1. skrivari.

og Flemming Mikkelsen 2. skrivari.

Tað er komið soljóðandi skriv til tingið:

"Vegna luttøku í kvinnuráðstevnu í Oslo, sum Nordisk Ministerråd skipar fyri, er undirritaða burturstødd hetta til 9. august, biðið verður um, at næstvalda á lista tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy fær sæti á tingi ímeðan".

Næstvalda á listanum í Suðurstreymoy hjá Tjóðveldisflokkinum er Ingrið Sondum.

Tað er somuleiðis komið soljóðandi skriv til tingið:

"Av tí at eg eri burturstaddur á ólavsøku, heiti eg á løgtingið um at læta næstavalda á lista javnaðarfloksins

í Suðurstreymoy taka sæti á tingi frá 29.juli og 7 dagar fram.

Undirskrivað av Jóannesi Dalsgaard.

Næsti maður á listanum í Suðurstreymoy hjá Javnaðarflokkinum er Jona Henriksen, sum eisini hevur tikið sæti á tingi fyrr, síðan seinasta væl.

Síðan er eitt skriv komið til tingið sum er soljóðandi:

"Vegna uttanlandaferð í almennum ørindi verður við hesum søkt um farloyvi og at næsti maður hjá Kristiliga Fólkaflokkínum Føroya Framburðs og Fiskivinniflokki í Suðurstreym tekur sæti fyribils á tingi."

Undirskrivað av Tordur Niclasen.

Næsti maður á tí listanum er Juul Jacobsen, og hann hevur eisini tikið sæti á tingi fyrr.

Teir tingmenn, sum síðani greiða atkvøðu fyri, at Ingrið Sondum, Jona Henriksen og Juul Jacobsen kunna taka sæti á tingi verða bidnir um at reisa seg.
(Atkvøðugreiðsla).

29 atkvøður fyri og eingin ímóti, sostatt er tað samtykt.

So hevur løgmaður orðið, løgmansrøðan 1988.

Løgmaður

Harra formaður.

Eins og undanfarin ár, so setti sitandi samgonga sær fyri umskipan av landsstýri, og nú valskeiðið er nærum runnið, kann ásannast, at sjálðan er stórur partur av einum samgonguskjali vorðin veruleiki, sum hesa ferð.

Hava vit tey sera truplu búskaparviðurskiftini, sum valdaðu við ársskiftið 1985, og sera viðbreknu figgjarviðurskiftini í okkara vinnulívi, í huga, so er tað merkisvert, at so stórur partur av eini politiskari stevnu kundi koma inn aftur í verkið. Hinvegin eru eisini týðandi mál, sum ikki eru rokkin, og í millum hesi einstøku, sum skuldu givið okkum betri møguleika at samskipa alla fløgustýring og forða fyri, at tiltøk, sum eru sett í verk heildini at frama, verða undirgingin av einstaklingum og feløgum, sum misnýta skipanirnar og harvið innan hola ikki bara skipanirnar, men allan samfelagsbúskapin.

Sum ofta nevnt, so er føroyski kapitalmarknaðurin sera opin, og so leingi kreditvirði føroyinga er so stórt, at tað ikki stendur á at útvega figging uttanifrá, so leingi er torført at avmarkað samlaða íløguvirksemið serliga so leingi, sum neyðuga samskipanin av virkseminum hjá bankum, figgjarstovnum, privatum, kommunum og landi ikki eru undir eftirliti landsbankans. Men hesin er jú júst farin at virk

og fyribils eru tekin um, at partarnir líta fram til eina samvinnu í samráðingum og eiga vit at lata hesar samráðingar standa sína roynd. At tað kanska fer at hepnast, eru størri vónir um, nú næstan allir partar eru samdir um, at virksemið í landinum er ov stórt og at tað eru ov stóru íløgurnar, sum eru høvuðstrupulleikin í føroyskum búskapi í dag. Hesin trupulleiki er kortini ikki størri enn so, at ein avmarking við einum 300 mió. kr. setti okkum í javnváð støðu. Tað er ongin orsøk til at dylja, at tær íløgur, sum ynski er um komandi 5 til 6 árini, mugu og skulu javnast út yvir 8 til 10 ár, soleiðis sum gongdin í framleiðsluvirðinum hevur verið í 1987 og 1988. Henda meting kann sjálvsagt broytast, um so er, at væntaða økingin í framleiðsluvirðinum kortini fer at sýna seg komandi 2 til 3 árini, og okkurt bendir á, at so verður. Men við teimum bakkøstum sum vit hava fingið 3 ár á ræð í framleiðsluvinnuni, har útflutningurin bara veksur við einum 50 til 100 mió. kr. árliga, meðan innflutningurin veksur við einum 200 mió. kr. árliga og íløgulánini framvegis liggja óvanliga høgt, so er niðurstøðan, at íløgurnar skulu tálmast nakað. Eg skal nerta við seinni, at vit eru í tí hepnu støðu, at hetta væl letur seg gera.

Gjaldsjavnahallið í 1988 er framrokna at gerast góðar 700 mió. kr. og harvið kemur uttanlandsskuldin við árslok at liggja um 4,600 mia. kr. hon veksur sostatt 4 ár við 1.500 mió. kr. og hetta er meira, enn samgongan hevði vónað. Men kortini einar 1000 til 1500 mió. kr. minni, enn roknað var við í fjør. Tingmenn minnast kanska, at eg metti í fjør, at vit fóru ikki stórvegis upp um 4 mia. kr., men vit koma so upp á góða hálva fimtu.

Orsøkirnar til, at útflutningurin ikki veksur meira enn við einum 75 mió. kr. í mun til 1987, eru fleiri m.a. fiskaloysi eystanfyri og eitt ávíst prísfall á saltfiski, sum merkir, at 3000 tons færri eru útflutt og virðið er minkað við 75 mió. kr. Frystiframleiðslan er í nøgd og virði næstan tann sama, sum árið fyri, hóast prísfall nú í nakrar mánaðar.

Íðnaðarfiskur og framleiðsla úr íðnaðarfiski eru vaksin og vaksa munandi út á árið, bæði í nøgd og virði. Higartil er nøgdin vaksin so mikið, at samlaða tonsatalið, sum vit hava útflutt fyrra hálvár er, 130.000, ímóti 107.000 fyrra

hálvár í fjør.

Rækjuútflutningurin er øktur við 1800 tonsum og 70 mió. kr. Her í liggur ein prísvøkstur upp á eini 5% og nøgdarvøkstur serliga stavandi frá Kanada-loyvinum.

Hinvegin hevur alivinnuni verið bakkast fyri, og er tí ein væntandi útflutningsvøkstur uppá einar 300 til 400 mió. skotin fram ávikavist í 1989 og 1990. Orsøkin er furunkolosufelli og annað felli í 1986. Alivinnan er ein vinna, sum krevur nógvan pening til goymsluuppbygging. Innflutt er í 1988 fyri einar 90 til 100 mió. kr. í fóðri og er hesin innflutningur sterkt økjandi, væntandi við einum 30 til 40% árliga. Hesar goymslur saman við teimum sera stóru fiskagoymslunum, sum vit hava í løtuni vegna trekan marknað og lágan prís benda á, at undir vanligum viðurskiftum og við eini miðal troytan av tilgongi-ligum kvotum, so skuldi okkara útflutningur ligið einar 500 til 600 mió. kr. hægri og gjaldsjavnahallið harvið verið burtur.

Um so var, so kundu vit endurskoðað íløgurnar og bara avmarkað í mun til tað, sum ovurvirksemið og tørvurin á arbeiðsmegi tilskilar.

Men hóast tað er rættiliga vist, at støðan batnar út á heystið og komandi ár, millum annað tí at proteinframleiðsl[illegible] í heiminum er minkað, so er nevndi vøkstur enn ein fuglur á tekjuni, og tí stendur fyribils niðurstøðan sum eg nevndi í áðni, við, vit mugu og skulu toyggja samtyktir og ynsktu íløgurnar út yvir 8 til 10 ár heldur enn 5 til 6 ár.

Innflutningshagtølini vísa, at tað framvegis er vøkstur í tilfarsnýtsluni til byggivirksemið, serliga til bygningar, við heilum 20%, meðan onnur framleiðsla í innflutningi liggur í fastari legu.

Maskinur og kapitalútgerð vaksa, tí at SEV fær ein stóran motor, men annars minkar hesin innflutningur, sum hevur verið sera stórur.

Bilkeypini tykjast at fækka, og her er minkingin 30%, meðan lastbilar framvegis verða innfluttir í stórum tali.

Vørur til vanliga nýtslu, [illegible] sum undanfarin ár eru vaksin sera lítið, soleiðis sum eisini ætlanin var við teimum nýtsluavmarkandi tiltøkunum í 1986, vaksa nú aftur við heilum 9%. Tað tykist, sum tann stóri lønarvøksturin í 1987 og 1988 rættiliga økir aftur um nýtsluna nú.

Hesin lønarvøkstur er samanlagt 17% í mun til tíðarskeiðið

í fjør. Partvist er hetta ávirkað av verkfallinum í mai 1987, og helst er eisini talan um eina ávísa longliðing, men kortini er tað óvanligt, at samlaðu útgjaldingarnar fyrra hálvárið eru størri enn seinna hálvár staðin fyri, ti vanliga so økist samlaða útgjaldingin frá fyrru helvt til seinnu helvt av árinum.

Inflatiónin, dýrtíðin, hevur verið 3 til 4% tað seinasta árið, so í veruleikanum merkir tað, sum verið hevur, eina stóra reallønarhækking, men fyrst og fremst stórt virksemi soleiðis, at tann linkingin, sum vit hildu okkum kenna í 1987 er burtur, og virksemið er aftur farið at vaksa.

Samgongan setti sær í 1985 fyri at reka meira avmarkandi og konsolidérandi fíggjarpolitik, enn verið hevði. Mett var neyðugt at tálma nýtsluna og útvega fíggjarlógunum avlop soleiðis, at millum annað teir mongu grunnar, sum vóru í afturhond, kundu styrkjast og leggjast kundi upp fyri til útgjalding av nógvum veðhaldsmilliónum, sum vit vistu vóru í vanda.

Landskassahallið uppá 60 mió. kr. í 1984 og 1985 minkaði tað stutta fíggjarárið 1985 til 22 mió. kr. og gjørdist eitt avlop uppá 257 mió.kr. í 1986.

Við fyrvarni av, at endaliga fer fram fyrr enn í oktober skattarokningin fyri 1987 ikki 1988, sýna tølini í dag fyri 1987 eitt yvirskot uppá 290 mió. kr. og herumframt eru 93 mió. kr. lagdar í oljugrunnin.

Gongdin í toll og skattainntøkum í 1988 bendir á, at landskassin kann greiða sínar skyldur hampiliga væl og kortini fáa eitt avlop. Hesin politikkur hevur verið heppin, tí sum øllum kunnugt, so eru hesi árini útgoldnar 100 tals mill. kr. fyri fallin veðhald, og vit vita, at eisini 1988 og 1989 gera stór veðhald effektiv.

Játtanirnar til veðhaldsgrunnin vóru sera smáar framanundan, og hesar vórðu tí øktar við einum 300 mió.kr. eyka hesi árini, og í alt mugu vera útlagdar einar 600 mió. kr. seinastu 8 árini, harav ein stórur partur er útgoldin tey seinastu 2 til 3 árini, so eisini her kemur væl við. Búskaparfrøðingar tosa meira og meira um tað órímiliga í, at tað ber til at lána til uppsparing. Tað hevur vundið nógv uppá seg at lána uttanlands til innseting í føroyskar peningastovnar. Hetta minkar um møguleikan fyri at lætta um hjá teimum, sum noyðast at lána pengar til at fáa tak yvir høvdið.

Eingin politikari ynskir at gera tað tyngri at seta búgv.

Eingin politikari ynskir at

tyngja um hjá familjum, sum noyðast at bera lán. Eingin politikkari ynskir at skerja uppsparing, men vil framvegis stuðla og premiera slíka.

Tí er tað spell, at vit ikki í felag kunnu burturbeina hesa dupultspekulatión og varðveita fyrimunirnar.

Vónandi kann eitt komandi løgting typpa hetta rentuhol, sum nú fleiri og fleiri smoykja seg í gjøgnum fyri at skulka undan samfelagsskyldum, skyldum, sum onnur mugu rinda inn í skatti og tolli.

Sum eg nevndi, so kann ein minking í samlaða íløguvirkseminum uppá einar 300 mió.kr. veita okkum betur búskaparjavnvág.

Vit eru í teirri hepni støðu nú, at hóast beinleiðis nýtslan er vaksin nakað, so er hesin vøkstur munandi minni enn í grannalondunum, og íløgupartурin av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni er so nógv størri enn hjá teimum. Vit kunnu tí minka henda part uttan, at tað sum soleiðis í grannalondunum fær arbeiðsloysi sum avleiðing.

Men í hesi raðfesting ella prioritering fyri tey komandi 8 til 10 áríni er neyðugt at hava vinnulívsíløgurnar fremri enn aðrar íløgur soleiðis, at neyðug útskifting av vinnutólum kann fremjast, og ávísum samskiftiíløgum slepst heldur ikki undan, tí hesar vaksa um landið, varðveita búsetingarmøguleikar og eru fortreyt fyri vinnuvirksemi. Tað er sum so - otta sagt framleiðsla saman við ávísum afturhaldi, sum kann loysa okkum úr fíggjarligum høftum.

Tað hevur verið talað nógv um ov stórar skipaíløgur og hesar hava verið stórar, men við tí politikki, sum nú er lagdur, so fara tær at minka. Skip skulu út og skip skulu inn, og á Føroyaleiðunum kann hetta bara láta seg gera, um samstundis verður framdur niðurskurður í veiðiorkuni.

Tann minkaði stuðulin til skipabyggingina og veruleikin, at framyvir verða bara latin 5% í veðhaldi saman við útvegaðum síðustillaðum bandaveðhaldi uppá 5%, so vil tað væntuliga geva okkum tey frægastu projektini, best vurderaðu projektini ið hvussu so er, s- so aftur skulu metast nágreiniliga av sáttmálastovninum.

Harumfrant eru tað krøvini til, hvat vit kunnu rokna sum eginpeningur sum eginpeningsnevndin setti upp í fyrraárið, tey vilja eisini ávirka sítt soleiðis, at saman um tikið er samtykt eitt munandi afturhald viðvikjandi skipaíløgum.

Fiskiskip eru tó lívsgrundarlagið, og vit mugu ansa eft-

ikki at skerja íløguhugin so nógv, at ikki nýroyndir verða framdar. Tær, sum eiga lívið í okkum, eisini tær vágiligu og lutvíst mishepnaðu.

Havnaætlanin er ein 8 ára ætlan og har má so ansast eftir, at byggingarnar ikki verða framdar skjótari.

Sjúkrahúsbyggingin er ætlað yvir 7 ár, og skúlabyggingin eitt líknandi áramál.

Tað verða so aðrir almennir stovnar, kommunalir og privatir, sum mugu toyggjast viðvíkjandi útbyggingum, og her vóni eg, at peningastovnarnir kunnu medvirka til at ávirka hetta yvir lánveitingarnar.

Við árslok 1987 vóru vit rættiliga bjartskygd um tann góða Noregs/Sovjettsáttmálan, tí kvoturnar vóru sera nógv vaksnar og stovnsmetingarnar vóru góðar.

Vit væntaðu tí eisini, at feskfiskaflotin fekk burtur úr hesi øking, og teir veiddu eisini út við 3000 tons eystanfyri fyrst av árinum. Men fiskiskapurin er minkaður burtur í onki og hetta er eitt álvarsligt afturstig fyri saltfiska og flakatrolararnar.

Á Flemish Cap er sum kunnugt eingin veiða í ár og saltfiskalínuskipini hava tí stórar trupulleikar. Eisini frystilínubátarnir hava drigið ov lítið fyrra hálva árið, men nú svartkalvatíðin er byrja, sær eitt sindur frægari út.

Laksaveiðan innan 200 fjórðingamarkið sveik heilt, og hesi skip leita nú eftir øðrum møguleikum. Tað verður talað um, at royna eftir tunfiski og øðrum virðismiklum fiski á opnum havi. Og landsstýrið stuðlar slíkum royndum.

Men Føroyaleiðirnar hava sum nevnt roynt eins drúgvari og seinasta ár og nóta- og íðnaðarflotin átti við verandi prísum at fingið eitt hampuligt ár.

Svartkjaftavinnan, sum vit høvdu so góðar vónir til á ólavsøku í fjør í samband við, at skræðuleyst og beinfrítt flak kundi framleiðast og hildu vit, kundi seljast fyri góðan prís, har eru vónirnar fjaraðar nunandi, og tað tykist at vera tungt at koma víðari nú, tvey skip eru løgd vegna figgjartrupulleikar.

Annars vísa rakstrartølini fyri 1987 fyri teir flestu skipabólkarnar frægari úrslit enn árini framanundan, og hetta hóast slakari veiða var á Føroyaleiðunum í fjør, og tær umsóknir um serlán, sum eru innkomnar, tær prógva eisini, at tað ikki stendur so illa til í vinnuni, sum summir prestar prædika.

Tað eru politikarar og bløð, sum hava tikið sær rættin til at áseta ella definera at, fiskivinnan í Føroyum er í eini djúptgangandi kreppu, ja djypri enn naktantíð fyrr.

Kenda rættin eiga teir ikki til at definera og teir fáa hann heldur ikki og slík tala er heilt burtur við. Hon er líka so nógv burturvið sum trúttanin um, at avísir samgonguflokkar ganga við dulðum ætlanum um at sosialisera allan veiðiflotan, øll framleiðsluvirkini og alla fiskasølu bara soleiðis fyri sportin skyld, sum danskararnir siga.

So grunnum politiskum tjaki ber ikki til at luttaka í.

Vit áseta onga kreppu og viðganga heldur ikki, at ynski er um at jarðleggja vinnulívið, svølta fiskiflotan ella skapa hísagang. Men vit dylja heldur ongar trupulleikar, dylja ikki tey tiltøk, sum eitt ábyrgdarstýrið noyðist at seta í verk.

Tær skipanir, sum eru samtyktar til dømis viðvíkjandi at minka veiðitrýsti á Føroyaleiðunum, mugu fremjast, hóast tað kennist sárt hjá summum. Her er hugsað um økta meskavídd, størri minstamark, ásett fiskidagatal, avmarkað loyvi til Føroyaøkið o.s.fr.

Tað skerst ikki burtur, at okkara sølulið hevur avgerandi ávirkan á framleiðsluval og marknaðarval, og harvið aftur á hvørji fiskasløg, sum høvuðsdentur verður lagdur á.

Denturin hevur verið lagdur á at selja råvørur til íðnaðin hjá øðrum, heldur enn meira viðgjørda og góðskaða vøru. Hetta er kanska skyljandi, tí tað er tungt at bróta upp úr nýggjum og tungt at koma inn á varda marknaðin, men valið kemur okkum afturumaftur brekku nú, tí vit skulu í gjøgnum eina tunga umskipan. Tað stendur í dag greitt, at flakavinnan, rikin soleiðis, sum hon hevur verið í Føroyum, eingi livilíkindi eigur. Hon hevur kunnað verið hildin uppi við støðugt økjandi stuðulsveitingum og umfordeilingum, men einaferð steðgar hetta, tí ongastaðni er at fara eftir meira studningi.

Vit mugu aftur í eina støðu, har tað, sum krevst til renting og avdrátt av vinnutólum umframt lønir og kapitaltilvøkstur, fæst inn uttanífrá.

Tí er ein politikkur, har allir partar í meira mun enn nú, hvar veiðiliðið er harmonika í skipanini, merkja hvønn veg tað ber, so allir partar kunnu leggja seg í selan til at fáa broytt gongdina. Avmarkingarnar noyða okkum at veiða øll fiskasløg, eisini tey bíligaru.

Samfelagið hevur tí rindað fyri at steingja partar av flotanum burtur frá virðismiklari fiskasløgum, men eisini tey mugu virkast fyri at fáa meira fyri uttanlands. Tá tað t.d ber til hjá íslendingum at fáa so munandi meira fyri kongafisk, enn vit fáa, so skal tað eisini kunna lata seg gera hjá okkum.

Eg nevndi, at tað hevur verið tungt at fáa svartkjaftavinnuna at mala, men vit hava kortini ikki ráð at sleppa endanum, hetta er okkara stórsta tilfang, tað skal gerast ein lønandi vinna. Tað almenna hevur skyldu til at stuðla dyggiliga her ikki fyri at statsstýra eini vinnu, sum onkur vil vera við, men tí at so nógvir privatir eru útbløddir í hesi vinnu, sum hevur kanska verið hin libralasta av øllum í Føroyum, tí so lítið hevur verið latið í studningi.

Tá skipini skuldu útvegast, vóru tað nógvir privatir, sum vóru um boðið, og teir, sum sluppu at fremja íløguna, kendu seg hepnar, men í dag er eins og er, áræðið linkað, mátturin og peningaorkan gingin undan.

Tað eru ávísir veruleikar, sum siga okkum, at tað ber ikki til at sleppa endanum, og vit koma at innflyta fyri hundraðir av milliónum í alifóðri tey komandi árini. Hetta kundu vit eins væl framleitt sjálvir sum vit megnaðu at fáa til lands tey 15-25.000 tonsini av svartkjafti, sum hvørt skipið higar til hevur pumpað fyri borð aftur. Men tað krevjast serligar niðurkølingar og goymsluskipanir fyri at fáa gjøgnumført tað. Vit vita, at protein framleiðslan í heiminum er minkað. Vit vita um ætlanir, um aling í fjarðeystri í Afrika, ja, um allan heimin, sum eru so stórar, at tað ongantíð í verðini verður møguligt at útvega nóg mikið av fiski til fóður, og fiskur skal nýtast til fóður, tí hann hevur tey protein, tað er feittsýrur og aminosýra, sum krevjast til at fá eitt gott fóður.

Og vit vita eisini, at framleiðslutøkni, sum kann vinna á sandmaðka trupulleikunum finnst og kann útviklast t.d. granulat frysting og extrudering til lidnar vørur.

Men royndir og útvegan av kunnleika til framleiðslustýring kosta hópin av peningi, eins og tað kostar pening at gera seg óheftan á marknaðunum.

Eitt, sum dentur tí má leggjast á í raðfestingini av útbyggingini av okkara útbúgvingum, er at laga skúlan og útbúgvingina soleiðis, at vit gerast kunnug við nýtslu av hátøknifrøði soleiðis, sum so

mong onnur rávørufátæk lond hava verið noydd at gera, t.d. Japan, Danmørk og Svøríki.

Skulu vit lættari sleppa fram at marknaðum fyri viðgjørdum vørum, er ein avtala við felagsmarknaðin um teirra innara marknað lívsneyðug.

Hon kann eftir landsstýrisins tykki ikki merkja, at vit gerast limir, men kemur helst at krevja ávísar harmoniseringar innan tolløkið og burturbeining av verjutolli.

Tað er serliga við hesum í huga, at landsstýrið hevur skipað eina serliga tollumsiting.

Innflutningsgjaldsskiparin hjá okkum kemur eisini í vanda, felagsmarknaðarlonðini tey hava meirvirðisgjaldsskipan, tað er tí møguligt at eitt nýtt løgting fær slíka skipan at taka støðu til.

Nú okkara samfelag í stóran mun broytist soleiðis, at størri partur av samfelagsorkuni verður nýttur í sekundér vinnuni, so vildi ein momsskipan, meirgjaldsskipan, kanska hóska betur enn verandi innflutningsskipanin, tí momsskipanin rakar ikki útflutningsvinnuna og hon tekur mest frá teimum, sum brúka mest eisini slíkum, sum kunnu brúka, tí tey hava skákað sær undan skatti og øðrum skyldum.

Tað er stór kapping um arbeiðsmegina í íðnaðinum. Alt ov ofta fara fleiri føroyingar undir somu framleiðslu við tí úrsliti, at trupult er hjá nøkrum at klára seg. Ofta verður hugsað ov lítið um sølu og marknaðarkanningar, áðrenn farið verður undir framleiðslu, og tað má tíverri ásannast, at eginpeningurin ofta er í minna lagi.

Spekulatiónstiðirnar fara at hasa av, føroyskur íðnaður, handverk og tænastuvirksemi mugu rokna við, at tey leingi koma at kenna avleiðingarnar á. eini tíð við dýrum grundøkjum, høgum stovningarútreiðslum, dýrum og ótryggum tænastuveitingum, einum sum heild avskeplaðum lønarlagi og tvørrandi arbeiðsmegi. Tað kann verða ringt hjá føroyskum íðnaði, handverki og tænastuvirksemi at fóta sær í hesi støðu, men hetta er og verður neyðugt.

Skal virkjunum verða liv lagað, og skulu tey hava framgongd, so verður neyðugt hjá teimum at bøta munandi um arbeiðsumstøðurnar soleiðis, at talið á arbeiðsfólki verður minst møguligt og at tey starvandi fáa góðar, tryggar og áhugaverðar arbeiðsumstøður, har teimum verður sýnt álit sum medávirkandi samstarvsfelagar. Virkini mugu rationalisera,

effektivisera og í størst møguligan mun leggja seg eftir dygd og kunnleika í øllum liðum. Kapping kann vera góð, ti hon eggjar virkjunum til at mennast og eggjar teimum starvandi til nýhugsan.

Landsstýrið heldur tó, at tað í dag er stórur tørvur á samstarvi millum føroysk virkir, so at tey kunnu ogna sær serkunnleika hvørt á sínum øki og harvið gerast kappingarfør, heldur enn at fevna um alt, t.v.s. alt tað sama, sum hini virkini eisini gera frammanundan.

Til at ráðgeva landsstýrinum og almennum grunnum, fyritøkum og einstaklingum, sum reka vinnufyritøkur ella hava áhuga fyri at fara undir slíkan rakstur, hevur Menningarstova landsins virkað nú næstan í eitt ár. Enn er stovnurin lítil, men kortini hevur hann megnað at gera vart við seg, tá talan er um vørumenning, sølufremjandi arbeiði, skeiðvirksemi og ymiska rágeving. Fjarskotnum oyggjum og bygdum tørva serligan menningastuðul. Landsstýrið hevur umhugsað, á hvønn hátt Mennigargrunnur Ídnaðarsins kann koma at veita slíkan stuðul.

Tey seinastu 10 árini er landbúnaðarframleiðslan vaksin, serliga mjólkaframleiðslan, hon er vaksin við 4 mió. lítrum til nærum 6 mió. litrar, og tað eru nú gott 100 húskir, sum kunnu hava sína ársinntøku í mjólkaframleiðslu. Úrslitini í hesi framleiðslu eru júst lýst niðanfyri í røðuni í smálutum, so eg skal ikki lesa tað, men nevna, at í landbúnaðinum hava vit fingið eina avloysingarskipan at virka partvíst, og nevna, at á lógarøkinum hava vit fingið nýggja jarðarlóggávu, sum áleggur framleiðsluskyldu og ger tað møguligt at fáa annan festara ístaðin, um framleiðsluskyldan ikki verður hildin. Við hesum skuldu møguleikarnir hjá fyrisitingini at fáa festarar við yrkisligum fortreytum og hegni til at røkja jarðarbrúk verið betri.

Í dag hava vit 21 smoltstøðir og 55 alistøðir á sjónum. Smoltframleiðslan er 4,5 mió. og tað nøktar tørvin í løtuni. Samlaði útflutningurin var í fjør 3.830 tons, og er mettur í ár at verða til 3.200 tons ella nakað minni. Orsøkin er, sum áður nevnt, felli.

Landsstýrið hevur givið 14 nýggj loyvi til sjógvaling. Um hesi koma í gongd og fáa vit tamarhald á sjúkunum, so verður framleiðslan 9.000-10.000 tons í 1989 og 10.000-12.000 tons í 1990. Við eini varisligari meting, skuldi hetta givið eitt

útflutningsvirði uppá ávikavist 500 og 700 mió. kr. nevndu ár.

Ein partur av teimum nýggju sjógvaliloyvunum er givin á økjum, har sum vit fyrr høvdu tað fatan, at aling ikki kundi fara fram, orsakað av aldu. Talan er sostatt um áhugaverdar royndir, royndir, sum kunnu vísa enn størri møguleika á sjónum. Slíkar støðir hava størri framleiðsluorku, eru minni viðbreknar móti sjúkum og lætta um um inni á firðum.

Tað er samtykt at útbyggja støðina hjá P/F Fiskaaling við Áir. Útbyggingin kemur at kosta umleið hálvthundrað milliónir krónur, og hon verður framd yvur eitt fýra-seks ára skeið. Ætlanin við hesi útbygging er ikki, at støðin skal økja munandi um framleiðsluna av smolti og matfiski. Høvuðsendamálið er at bøta um umstøðurnar á støðini soleiðis, at hon í størri mun kann skipa fyri royndum, fremja gransking og standa fyri praktiskari útbúgving og eftirútbúgving av fólki, sum skal starvast í vinnuni.

Tann týdningarmesta orsøkin er tó, at samstarvið, sum vit føroyingar hava havt við Noreg um kynsbótaarbeiði av ymiskum orsøkum kemur at steðga, soleiðis at vit sjálvir taka ábyrgdina av at útvega lívfisk á hægsta støði til ta skjótt vaksandi føroysku alivinnuna. Og undir verandi umstøðum er støðin hjá P/F Fiskaaling ikki útgjørd til at klára hetta arbeiði.

Landsstýrið hevur samtykt at fremja uppbyggingarnar í sjóvinnuumsiting yvir eitt áramál. Og hevur samtykt at seta ráðgeva í sjóvinnumálum. Vit skulu tá skjótt kunna boða IMO frá, at Føroyar hava ratifiserað STCW sáttmálan. Síðani kunnu fleiri kunngerðir setast í gildi við heimild í nevndu lóg.

Ein stórur partur av okkara farmaskipaflota kom í álvarsligar trupuleikar, sum vit vita. Talan var um tann nýggjasta partin av flotanum. Hesin parturin av flotanum hevði ongan møguleika. Byggikostnaðurin var alt ov høgur. Rakstrarútreiðslurnar alt ov stórar og flutningsinntøkunar alt ov lágar í mun til íløgurnar og rakstrarútreiðslurnar.

Tá henda samgonga var skipað, vóru størri broytingar í skattalógunum og ein útbygging at skattaumsitingini nøkur av høvuðsmálum, hon setti sær.

Í Føroyum høvdu vit onga lóggávu fyri skatting av kapitalvinningi, soleiðis sum í grannalondunum. Vinningur var skattafrír. Hetta merkti, at

persónar og feløg kundu vinna milliónа upphæddir, ja, í mongum førum tíggjutals milliónaupphæddir skattafritt við sølu av skipum ella fastari ogn.

Henda vantandi lóggáva var kanska eisini ein av høvuðsorsøkunum til tær mongu sølurnar av gomlum skipum til uppskrúvað virði, og keypararnir av hesum skipum standa sum kunnugt í dag við eini alt ov stórari afturgjaldingarskyldu. Hetta er kanska ein av orsøkunum til trongstøðuna, sum ein partur av fiskiflotanum er í.

Eftir nýggju lógini verður kapitalvinningur skattaður sum vanlig inntøka.

Tað eru eisini gjørdar stórar broytingar í avskrivingarlógini, so sum frágreitt í røðuni, og tað eru samtyktar broyttar revsireglur. Tað var tað sokallaða sjálvstýrislandsstýrið, ið sat frá 1962 til 1966, sum álegði føroysku peningastovnunum upplýsingarskyldu mótvegis líkningarvaldinum.

Henda upplýsingarskylda merkti, at skattavaldið kundi fáa allar tær upplýsingar av skattligum týdningi, sum tað ynksti um hvønn einstakan kunda hjá einum peningastovni. Líkningarráðið kann eftir hesi reglu t.d. fáa avrit av hvørjum einstøkum kekki, ið ein ávísur persónur hevur skrivað í eitt ár, ella hvørjari bankaflyting, hann hevur gjørt o.s.fr.

Nevnda upplýsingarskylda stendur við óbroytt, men broytingin liggur í at heimild er skapt til at nýta teknifrøði, nýggja teknifrøði, sum er vorin tøk saman við samtíðarskattaskipanini, til automatiskt at útvega skattavaldinum ein part av teimum áðurnevndu upplýsingum, nevniliga upplýsingar um innistandandi og skuldi við ársenda og upplýsingar um rentur. Talan er soleiðis ikki um, at skattanyndueikarnir fáa beinleiðis atgongd til konti hjá spararunum, men møguleiki er tó framvegis fyri hjá likningarráðnum at skriva til peningastovnarnar smbr. heimildina frá 1963 og fáa nevndu upplýsingar.

Broytigin í upplýsingarskylduni merkir, at líkningararbeiðið kann gerast munandi meira effektivt, og at samtíðarskattaskipanin kemur at arbeiða rættari og tryggari fyri skattgjaldaran.

Tað eru gjørdar avtalur um dupultskatting við donsku stjórnina og arbeitt verður víðari við at fáa aðrar dupultskattaavtalur í lag.

Tann fyrsti parturin av sam-

tíðarskipanini fór í gongd 1. apríl 1984, og tá vórðu tríggjar skráir tiknar í nýtslu, men tá var nógv eftir av arbeiði at gerða á hesum økinum. Men nú er hetta arbeiðið gjørt, og vit hava í dag koyrandi 17 skráir.

Landsstýrið hevur avgjørt at nýta samtíðarskattaskipanina til aðrar uppgávur so sum frítíðarløn, barnastyrk, trygdargrunn løntakaranna og arbeiðsmarknaðareftirløn.

Hetta eru stórar uppgávur ið verða lagdar á Elektron og umsiting líkningarráðsins, men alt í alt so kann man siga, at hesar uppgávur eru dømi um, at tað eisini ber til at loysa størri edv-uppgávur í Føroyum, og tí er tað spell, at ein partur av hesum arbeiði gerst dýrari, tí orkur av luttakarunum í P/F Elektron fer til Danmarkar við sínum uppgávum.

Fyrr vóru tað bara Tórshavn og Klaksvík sum høvdu eina veruliga skattaumsiting. Hetta merkti, at skattaálíkningin var ikki eins um landið alt soleiðis, sum ásett í lógini, men vit fingu við samtíðarskattaskipanini eina skipan, har hvør einasta lønútgjalding verður skrásett og viðgjørd, og hetta merkti munandi størri samskifti í millum skattgjaldara og skattavald.

Tí setti man sær sum mál um at útbyggja hesa skattaumsiting og tað er nú gjørt. Man hevur flutt arbeiðspláss út á bygd, man hevur fingið eina líkning runt um landið, sum er meira samlík, og man hevur fingið eina meira effektiva líkning og eitt hægri tænastustøði til borgaran.

Vit hava fingið eina uppgávu at arbeiða við nú í sambandi við at danir avtaka sjómansskatta- , lógina.

Tað er komið nakað ávegis við broyting í skatting av eftirlønum sum eru innistandandi í Danmark, so alt í alt má sigast, at á líkningarøkinum og skattaøkinum er gjørt eitt stórt arbeiði hesi her 4 árini.

Í røðuni í fjør var eg bjartskygdur viðvíkjandi einari fyrireiking, sum SEV og Orkuráðið vóru farin undir um útbygging av vatnorkuni í hæddini í Eysturoy.

Men hóast tað, at Orkuráðið klettafast hevur ávíst, at SEV tveitir 40% av orkuni burtur við at útbyggja í neðra, so verður henda útbygging hildin fram, helst í heimilidarloysi.

So metingin, sum eg hevði í fjør um, at skil kom at ráða, hon brast.

Landsstýrið hevur játtað stuðulslán til eina verkætlan sum Tórshavnar kommuna og SEV hava um eina nýtslu av avlops hita

til húsaupphiting.

Annars hevur Orkuráðið latið frágreiðing um sitt virksemi og henda er hjáløgd sum skjal. Serliga forvitnisligt er arbeiði ráðsins við streymorkuverkið í Vestmannasundi.

Tað er framvegis stórur tørvur á sethúsalánum úr Húsalánsgrunninum, bæði til bygging av nýggjum húsum, til keyp av gomlum og eisini til umbygging.

Í 1987 var talið av lánum 578. Samlaða útlánsupphæddin var 73 mió.kr.

Við verandi fíggjarorku er Húsalánsgrunnurin bert førur fyri at veita 25% av tí samlaðu sethúsafíggingini. Eftir lógini kann grunnurin veita upp til 90%.

Ein fyribils setningur má verða, at grunnurin kemur upp á 50% av samlaðu fíggingini soleiðis, at hann saman við sparikassunum kundi fíggjað tey 90% og bankarnir harvið verið frígjørdir fyri eina uppgávu.

Hóast nýggj lóg um íbúðargrunn og ávísar broytingar í lógini um rentustudning til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging, so verða hesir møguleikar enn lítið nýttir, orsøkin er møguliga ov lítil upplýsing um hesar møguleikar.

1. januar vórðu fólkapensiónirnar og avlamispensiónirnar hækkaðar ájavnt við pensiónirnar í Danmark á flest øllum økjum. Heildarveitingin broytti ikki fíggingarmynstrið fyri pensiónina, sum framvegis er 50% føroysk og 50% donsk, men nakrar almannaveitingar vórðu broyttar soleiðis, at parturin hjá ríkiskassanum nú er 25%. Onnur øki eru broytt tann vegin, at fíggjarliga ábyrgdin einans er hjá føroyskum myndugleikum, her er talan um íløgur og rakstur av røktarheimum, heimahjálp og barnastyrki.

Brennistudningur til pensionistar, sum kemur til útgjaldingar seinni í ár, er hækkaður til 2.200 kr. og er samstundis vorðin ein samskiftisstudningur, sum kann nýtast til at rinda part av útreiðslunum til sjónvarps-, útvarps- og telefongjald.

Røktarheimið "Lágargarður" er tikið í nýtslu og tað fer at virka sum dagheim fyri gomul og brekað eisini.

Í hinum norðurlondunum verða slík heim ikki bygd longur. Nú verða bygdar vardar íbúðir í staðin, har tey gomlu meira kunnu liva sítt egna lív, tey missa ikki pensiónina heldur, men gjalda húsaleigu o.a. sjálvi so langt, sum tey eru før fyri tí. Henda vegin eiga vit eisini at fara í Føroyum.

Tí arbeiðir landsstýrið í løtuni við at fáa betri møguleikar fyri, at vardar íbúðir kunnu verða bygdar, og umhugsa at set lógina um kollegiubygging til at vera galdandi eisini fyri vardar íbúðir.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við at seta á stovn ein kanustovn fyir avgerðir á almannaøkinum.

Landsstýrið arbeiðir eisini við at seta á stovn ein barna- og møðrahjálparstovn og við at tryggja, at avlamisfólk og pensionistar kunnu fáa meira burtur úr arbeiðsinntøku uttan at missa burtur av viðbótini.

Miðspjaðingarnevndin, sum arbeiðir við at decentralisera socialu umsitingina, er liðug við arbeiði sítt nú, og tað er landsstýrisins ætlan at byrja at leggja socialar deildir út á bygd. Helst eina í hvørjari sýslu.

Í royndunum at fyriskipa desentralisering eru annars líkningardeildir lagdar út um landið.

Arbeiðseftirlitið hevur fingið skrivstovur úti um landið, so nakað er gjørt á tí økinum.

Fyri at tálma yvirupphitingini, sum hevur verið í byggivirkseminum her á landi, hevur landsstýrið verið afturhaldandi við at geva lán til kommunur og biðið kommunur steðga við arbeiðum sum kundu tola at bíða. Hetta er gjørt fyri at skapa skipum og fiskavirkjum betri arbeiðskor, tá tey nú eina tíð hava havt torført við at skaffa manning og arbeiðsfólk.

Landsstýrið samtykti sum kunnugt í vár eina løgtingslóg nr. 62 um skúlaútbyggingar. Landsstýrið hevur heitt á landsskúlafyrisitingina um at fara undir at fyrireika projektering og bygging av teimum skúlabygningum, sum har eru umrøddir, og gjørt vart við, hvørjir skúlar, ið eiga at koma í fremstu rað.

Sum tingmenn siggja niðanfyri, so er í einstøkum lutum greitt frá øllum ti, sum hendir viðvíkjandi útbyggingunum og niggjum útbúgvingum, sum verða settar á stovn. Eg skal ti ikki lesa tað nú, bert nevna, at menningin innan fritíðarundurvísingina hevur verið stór hesárini, serliga HF- stakgreinaskeiðið og skeið til stakgreinaundurvísing til frámfaringaroynd fólkaskúlans umfram yrkiskend skeið og serundirvísing fyri fólk fyri skúlaaldur, er sett á stovn eitt ymsastaðni í landinum, og at tað eru mong sum taka av hesum tilboðum.

Musikskúlin, ið hevur nøkur ár á baki sum skipan fyri alt

landið, hevur fingið góða undirtøku, og stavnhaldið, at so nógv børn og ung sum gjørligt skulu hava í boð í musikkundirvísing á høgum stigi, er rokkið víða um landið.

Vit kunnu taka saman um og siga, at hetta landsstýrið hevur lagt lunnar undir og skapt fortreytir fyri framhaldandi menning og gróðri innan skúla og undirvísing til gagns fyri øll, ið her balast og liva.

Tað var stórur setningur viðvíkjandi arbeiðaramálum og arbeiðsmarknaðarmálum, hetta landsstýrið setti sær. Og sum frágreitt her í røðuni, sum eg ikki skal lesa í einstøkum lutum, tað er rættiliga nógv hent á hesum øki.

Eg skal nevna sum tað týdningarmesta, samtykti lógina um Samhaldsfastan Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. Lógin fær gildi frá 1. januar 1990. Tá skulu arbeiðsgevarar og løntakarar rinda hvør sítt procent inn í grunnin. Hetta inngjald hækkar stigvíst til tað í 1999 kemur uppá 2% frá hvørjum. Og fyrstu útgjaldingarnar úr grunninum fara fram frá 1. januar 1992. Øll fáa lut í arbeiðsmarknaðareftirlønini, og tá ið útgjaldingin er komin í fulla hædd, verður hon at svara til umleið 50% av galdandi fólkapensión. Sum kunnugt tingmenn minnast, at landsstýrið skjeyt upp, at hon skuldi verða á hædd við eina fólkapensión, men neyðsemjan gjørdi sum kunnugt, at vit fingu hesa skipan í staðin fyri men tað er framvegis ein spurningur, um tað ikki er rætt at broyta lógina soleiðis, at skipanin kann takað við 1. mei 1989, so man sleppur undan teirri støðu, at arbeiðsfólk fáa útgoldið hetta eina procentið eina stutta tíð og skulu spæla av við tað aftur, men hetta kann løgtingið so umhugsa áðrenn tað tíð .

Samferðslumálini eru lýst í fylgiskjølum frá landsverkfrøðingsstovninum, men tvær serar stórar íløgur standa fyri, sum skulu nevnast serstakt.

Ferjulega á Gonlu rætt saman við havnabygging í Skopun og undursjóvartunnil undir Vestmannasund, verða tung at lyfta, men soleiðis sum miðdeplaútviklingurin hevur tikið seg upp, er tað forsvarligt at styrkja møguleikarnar hjá Vágoynni, Sandoynni og Suðuroynni at fáa lut í menningini. Hetta seinasta gerst so fyribils frægast við at útbyggja ferju- og tyrlusambandið við Suðuroynna so nógv, sum tað til ber.

At undirsjóvartunnilin fær

eina munandi sjálvfígging kann bert metast stórur fyrimunur.

Landsstýrið hevur í ætlan sini um endurskipan av umsitingini í Tinganesi í hyggju at skipa viðgerðina av landsstýrisins parti av samskiftismálum í serstaka deild við deildarleiðar og stjóra. Søkt verður eftir slíkum fyrsta dagin.

Í ár var samferðslusøga skrivað, tá vit settu egi flogfelag á stovn Atlanic Airways.

28. mars byrjaði henda regluliga flúgvingin og, sum tingmonnum kunnugt, sær út til at ganga sera gott hjá hesum felag.

Eisini var ein annar merkisdagur í flogsøguni hjá føroyingum 1. desember 1985, tá ið vit yvirtóku operativu og teknisku umsitingina av tyrlutænastuni her og sostatt stóðu á egnum beinum.

Landsstýrið hevur havt ynski umm, at ein tyrla skuldi verða tøk alt døgnið soleiðis, at m.a. útoyggjafólk kundu verða tryggjað flutning alt árið m.a sjúkraflutning og við tveimum tyrlum er hetta mál rokkið.

Telefonskipanin hevur framhaldandi verið útbygd sambært 5- ára ætlanina sum, varð samtykt av løgtinginum á vári 1986.

Í mun til hesa fíggjarætlan eru fíggjarviðurskiftini batnað munandi, grundað á lægri dollaravirði, vaksandi inntøku og lægri vøkstur av útreiðslum. Hetta hóast takstirnir hava verið óbroyttir øll hesi trý árini 1986, 1987 og 1988.

Tað er í smálutum greitt frá hesari útbygging, so eg skal heldur ikki lesa tað, men bert nevna, at aftan á drúgvar samráðingar, er komið til semju um, at telefonverkið átekur sær raksturin av telegrafstøðini uppá treytir, sum siga, at raksturin skal hvíla í sær sjálvum, eisini aftan á yvirtøkuna. Ein avtala um hetta her er løgd við sum skjal til røðuna.

Tað situr ein nevnd sum skal fyrireika bygging av posthúsinum í Havn, posthúsbygging er farin í gongd í Saltangará og skal í gongd á Tvøroyri sum sambygging við aðrar byggingar.

Eisini hevur verið arbeitt við ætlanum um at byggja posthús í Sørvági. Har er kostnaðarætlan og skitsuprojekt gjørt í løtini.

Í apríl 1987 setti landsstýrið eina nevnd at kanna møguleikan fyri at yvirtaka skipaeftirlítið. Higartil hev

nevndin hildi 7 fundir, og hon verður væntandi liðug við arbeiði sitt beint eftir summarfríðtíðina. Landsstýrið skal tá taka støðu til, um samráðingar skulu verða við ríkismyndugleikarnar um hesa yvirtøku.

Orsøkin til, at spurningurin um yvirtøku av skipaeftirlitinum gerst meir átroðkandi nú er tann, at ein ávís umskiping fer fram í Danmark soleiðis, at Statens Skipstilsyn ikki er til longur, men er lagt undir Søfartsstyrelsen. Annars er kannan av hesi eisini partur av samgonguskjalinum frá 1985.

Í fleiri ár hava vit havt eina serliga ferðslulógarnevnd sitandi at gera tilmælir, hon arbeiðir í løtini við spurninginum um at seta á stovn eitt royndarkoyrikort og við spurninginum um hámarksferð.

Vit vita, at umhvørvisdálking er farin at gera vart við seg tey seinastu 8 árini. Tað er kanska ikki so nógv, vit kunnu gera á hesum øki, men vit eiga at gera tað lítla, vit eiga, fyri at fylgja við og fyri at fáa framt samtyktir sum, forða fyri umhvørvisdálking.

Tað er ongin ivi um, at leiklistin í Føroyum hevur havt trong kor tey seinastu mongu árini, men nú er so ætlanin framm um at gera ein sjálvognarstovn, sum kallast Leikpallur Føroya, sum skal hava til endamáls at menna leiklistina og verða ráðgevi landsstýrisins í hesum málum.

Landsstýrið hevur eisini sett eina nevnd til at virka fyri at fáa skjøl heim til landið, sum eru dýrgripir í okkara søgu og okkara mentan, og nú tann danska-føroyska "arkivavtalan" er gjørd, skuldi leiðin verið løgd til at fari víðari eitt nú undir samráðingar við svíar um Kongsbokina. Ein arbeiðsbólkur hevur greitt úr hondum eitt álit um eitt tjóðsavn í Hoyvík. Tað álitið hevur sum málsetning, at tjóðsavnið skal verða útbygt, áðrenn henda helvtin er runnin. Tingmenn fáa hesa ætlan til kunningar.

Tilgongdin til Fróðskaparsetrið hevur verið vaksandi og tað tykist sum tann útbúgving, sum her kann nemast, stendur mát við útbúgvingarnar uttanlands. Tann samvinna, sum er fingin í lag við háskúlar í grannalondunum, hevur eisini staðið sína roynd, og er hetta, at vit nú útbúgva tey ungu longri part av lærutíðini heima hjá okkum sjálvum, at meta sum ein veruliga stórur fyrimunur. Sjónvarpið er sum kunnugt illa fyri høllisliga og figgjar-

liga, og tað hevur verið arbeitt við ábótum her, men útbyggingin er sera dýr, og er ikki støða endaliga til til hetta enn. Tó hevur landsstýrið givið sjónvarpinum heimild at útvega sær eykainntøku við lýsingum, men slepst valla undan at økja beinleiðis játtanirnar næsta ár eisini.

Samgongan hevur roynt at brynjað seg til enn eitt samráðingartilfar um at gera málsøkið Føroya undirgrund til sermál.

Løgmaður setti ein arbeiðsbólk at útvega okkum eyka próvtilfar og lýsa spurningin úr fólkarættarligum, ríkisrættarligum sýni og annars við atliti til møguligar avtalur, sum gerast mugu við danskarnar, áðrenn yvirtøkuna.

Nevndin hevur greitt eitt sera nágreiniligt og fevnandi álit úr hondum, og meti eg, at vit eru væl betri fyri nú.

Men tilfarið er av slíkari náttúru, at tað ikki verður almannakunngjørt, áðrenn samráðingar hava verið.

Í fyrstu syftu verður hetta álit tí at viðgera í sjálvari samráðingarnevndini fyri aftur latnum hurðum, íð hvussu so er til vitað er, um danir eru sinnaðir at koma í veruligar samráðingar.

Vit fáa eitt nýtt løgting í heyst. Samgongan gongur óskammað fram fyri dóm veljarans.

Vit tóku við einum búgvi, sum hóast sterkt í grundini, tí tað eru Føroyar og fólkatilfarið á hesum oyggjum, hevði stórar trupulleikar, og lata frá okkum eitt búgv, sum er munandi styrkt og konsolideað.

Sjálvsagt eisini eitt búgv við trupulleikum og nógvum vandamálum komandi, men sum ávíst frammanfyri við størri frælsi í vali av møguleikum og amboðum, serliga á búskaparliga økinum.

Tað er munin hugaligari at virka fyri at loysa trupulleikar av ov nógvum arbeiði enn at laða upp í lið, sum komin eru í, av tí at einki var fyri hendurnar.

Vit fara ikki til valið at gykla fólki dans á rósum, men siga hart og ærliga, at avmarkandi politikkurin, ríkið hevur verið seinastu trý árini, má fasthaldast og í ávísan mun herðast.

Og vit gera greitt at onki gildi er ókeypis, rokningin kemur so ella so, tí ber ikki til at lova skatta ella tollløtta, og heldur ikki at lova risavøkstur í almennum tænastuveitingum.

Men læta vit teir breiðast og

sterkastu herðarnar bera so kann ein ávís umfordeiling fremjast, soleiðis at tað ikki tyngist um hjá vanligum fólki.

Vit gykla heldur ikki, at tað ber til at fremja veruligan vinnulívspolitikk heldur ikki sokallaðan vinnulívs vinarligan politikk bara við at troðka fram at landskassanum.

Hesin kassi skal hvørki hava hol í botninum ella lok, sum fýkur av, tað lotar úr hana-kjafti.

Vónandi gevur veljarin okkum eitt løgting, soleiðis sett saman, at allir samfelagsbólkar kenna seg tryggar.

Nøgdar við at teir fáa part í felagsognini, og fróar um, at hava lagt sín góða lut til tað solidariska heim, vit skapa okkum her.

Formaðurin

Ja, so var ikki meira til hendan fundin.

Næsti fundur verður mikudagin, 3. august 1988, kl. 14°° og tá er á skránni:
Val av nevndum sbr. tingskipanina.

So er fundur lokin.

Tingfundurin er settur.

Skrivarin lesur gerðabókina upp frá seinasta fundi.

Skrivarin

Fyrsti fundur.

Ár 1988, fríggjadagin 29. juli kl. 13°° var tingfundur settur.

Allir tingmenn vóru á fundi, allir landsstýrismenn uttan Karolina Petersen og Jóngerð Purkhús vóru á fundi, løgmaður var á fundi og rikisumboðsmaðurin var á fundi.

Til viðgerðar:

Formaðurin frá tingsetuni 1987 tók fyribils sæti sum formaður.

Formaðurin las upp. Skriv frá løgmanni, dagfest 11. juli 1988, har løgmaður stevnur løgtingsmonnum til tings ólavsøkudag.

Formaðurin lýsti løgtingi at verða setta til tingsetuna 1988.

Formaðurin bað tingmerninar Sverra Midjord og Flemming Mikkelsen verða fyribils tingskrivarar.

Val av formansskapi tingsins:

Til formann varð valdur Hergeir Nielsen, 1. næstformann Agnar Nielsen, 2. næstformann Tórálvur Mohr Olsen og 3. næstformann Jógvan Sundstein.

Til 1. og 2. skrivarar vóru valdir ávikavist Sverre Midjord og Flemming Mikkelsen.

Formaðurin læs skriv, dagfest 25. juli 1988 frá Karin Kjølbro, sum biður um farloyvi hetta til 9. august vegna uttanlandaferð og varamaður hennara tekur sæti á tingi. Við 29 atkvøðum móti 0 varð samtykt, at Ingrid Sondum skuldi taka sæti á tingi í hesum tíðarskeiði.

Skriv, dagfest 27. juli 1988 frá Jóannesi Dalsgaard, sum biður um farloyvi á ólavsøku vegna uttanlandaferð og at varamaður hansara tekur sæti á tingi hesar dagar. Við 29-0 atkvøðum varð samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sæti á tingi hesar dagar.

Skriv, dagfest 27. juli 1988 frá Tordi Niclasen, sum biður um farloyvi og at næsti maður tekur sæti á tingi. Við 29-0 atkvøðum varð samtykt, at Juul Jacobsen tekur sæti á tingi.

Løgmaður fekk orðið til ólavsøkurøðuna.

Formaðurín lýsti næsta fund at verða mikudagin 3. august 1988 við hesi dagsskrá:

Val av nevndum sambært tingskipanina.

Fundur lokin.

Formaðurin

Hevur nakar nakrar viðmerkingar til tað lisnu gerðabókina?

Ivan Johannesen (sb.)

Tað varð lisið, at allir tingmenn vóru á fundi. Tað kann ikki bera til.

Formaðurin.

Tað verður sagt, at tingið var fullmannað.

Ivan Johannesen (sb.)

Samstundis so biðja teir um farloyvi, og atkvøtt verður um, at nýggir menn koma inn, so tað kann ikki vera rætt.

Formaðurin.

Jú, jú, tað verður vanliga soleiðis, at sjálvt um tingmenn ikki eru, tá ið fundir byrja, bara teir eru her og eru staddir á fundinum einaferð, meðan fundurin er, so verður vanliga sagt, at allir tingmenn hava verið á fundi. Hetta er einki undantak í so máta.

Ivan Johannesen (sb.)

Teir vóru ikki á fundi.

Formaðurin.

Tað vóru 32 mans á fundi.

Ivan Johannesen (sb.)

Tá ið fundurin varð settur, vóru ikki 32 mans.

Formaðurin.

Nei, men tað vóru 32 mans á fundi, tað er tað, sum telur.

Aðrar viðmerkingar til gerðabókina?

Tað er tað ikki, so er gerðabókin góðkend.

Tað er býtt út til tingmenn frá formansskapinum fyri tingmannaráðnum tilmæli ella rekommentatiónir, sum eru samtyktar á ársetuni í Ilulissat í Grønlandi 15.-20. juli í 1988. Tað varð býtt út á seinasta fundi.

Tað er komið skriv frá Klaksvíkar kommunu um lántøku í sambandi við fíggjarætlanina fyri 1988 og tað skrivið verður beint til landsstýrið.

Jógvan Sundstein (ff.)

Eg gangi út frá, at tá ið Klaksvíkar kommuna sendir eitt skriv til løgtingi, so er tað tí, at hon vil hava løgtingi ella eina løgtingsnevnd til at viðgera málið. Landsstýrið hevur kommunan vanliga samband við, so eg haldi, tað er galið av tingformanninum at beina til landsstýrið, tá ið man skrivar til eina tingnevnd.

Formaðurin.

Jú, hin vegin so verður møguleikin opnaður fyri, at allar kommunur fara at gera tað sama, og so hugsi eg nokk, at løgtingi fer at yvirtaka ein stóran part av uppgávunum hjá landsstýrinum.

Hetta er eitt reint landsstýrismál.

Jógvan Sundstein (ff.)

Ja, tað eri eg gott klárur yvir, tað er eitt reint landsstýrismál, men tá ið landsstýrið ikki umsitur sítt mál rætt, eftir hvat er komið til tingið, so má tað vera uppgávan hjá tinginum, sum hevur eftirlit við landsstýrinum og hevur valt landsstýrið, at taka støðu til, um her er rætt farið fram.

Formaðurin.

Ja, er tað so, at tað verður biðið um eina atkvøðugreiðslu um, hvar hetta málið skal fara, so ber tað væl til. Klaksvíkar kommunu er ikki heimilað at leggja mál fram á ting, tað kunnu tingmenn ella tingflokkar gera, men sjálvandi tað er hent, meira enn so, at skriv eru farin í nevnd, sum eru løgd fram av persónum og kommunum. Tað verður skotið upp, at málið verður beint í figgjarnevndina.

Jørgin Thomsen (jv.)

Tað er vanligt at beina skriv til tær nevndir, sum hava mál til viðgerðar. Tá ið eitt mál liggur í eini nevnd t.d. og eitt skriv kemur í sambandi við tað málið, so verður tað beint ið tað nevndina, tað er í hvussu so er ógvuliga vanligt.

Í hesum førinum liggur eitt mál í landsstýrinum, sum vit vita, hjá Klaksvíkar kommunu og eg vil ið hvussu er mæla tinginum til at beina hetta málið í landsstýrið.

Formaðurin.

Jógvan Sundstein stendur fast við sítt uppskot.

Teir tingmenn, ið greiða atkvøðu fyri, at hetta skrivið fer í figgjarnevndina, verða biðnir um at reisa seg.
Tað eru 6 atkvøður fyri, so er tað fallið, at koyra málið í figgjarnevnd og málið verður beint til landsstýrið.

Síðani er eitt skriv, dagfest 16. juli 1988 um at gera Føroyar leysar frá Danmark og í hesum sambandi at seta upp eitt oljureinsiverk, undirskrivað av Einar Egholm í Streymnesi. Hetta skrivið verður beint í landsstýrið eisini, um ikki nakar annar hevur nakað annað ynski.

Síðani er tað ein umsókn um stuðul til vegagerð frá Hvannasunds- og Viðareiðis bygdaráðum, og tær umsóknirnar plaga vanliga at fara í samferðslunevndina. Hetta verður so beint í samferðslunevndina, hon verður vald á hesum fundi.

Síðani er eitt skriv frá

Gisla Rasmussen, sum ynskir at fáa kommunulógina broytta vísandi til, at Tórshavnar kommuna tekur grundarlagið undan einari privatari vinnutænastu, og tað skrivið verður eisini beint í landsstýrið.

Síðani er tað val av nevndum.

Tað verða valdar tær vanligu tingnevndirnar og Tingmannaráð Útnorðurs og Norðurlandaráðið.

Fyrst er tað fíggjarnevndin. Har eru seinast valdir og verandi fastir limir:
Jørgin Thomsen
Signar Hansen
Asbjørn Joensen
Adolf V. Hansen
Ivan Johannesen
Poul Michelsen og
Svend Aage Ellefsen
Er tað nakar, ið ynskir eina broyting har?

Jógvan Sundstein (ff.)

Vit taka Agnar Nielsen fyrst.

Agnar Nielsen (sb.)
Fyri anstøðuna sum fyrsti valdur:
Ivan Johannesen
Johannes M. Olsen
Flemming Mikkelsen
Pauli Ellefsen

Formaðurin
Ivan Johannesen, tað er afturval og Johannes M. Olsen tiltakslimur. Ja, vit eru ikki komin til tiltakslimirnar enn. Ja, og

Agnar Nielsen (sb.)
Flemming Mikkelsen

Jógvan Sundstein (ff.)
Fyri Svend Aage Ellefsen.

Formaðurin
Á. soleiðis ja.
og tiltakslimur:

Agnar Nielsen (sb.)
Pauli Ellefsen

Formaðurin
Og hann kemur fyri?

Jógvan Sundstein (ff.)
fyri Anfinn Kallsberg.

Formaðurin

Fyri Anfinn Kallsberg.

Jógvan Sundstein (ff.)

Fyri Fólkaflokkin í anstøðu er tað:
Poul Michelsen
Anfinn Kalsberg.

Formaðurin
Teir fastu límirnir í fíggjarnevndini verða so:
Jørgen Thomsen
Signar Hansen
Asbjørn Joensen
Adolf V. Hansen
Ivan Johannesen

Poul Michelsen
Flemming Mikkelsen

Og tiltakslimirnir:

Jákup Lindenskov
Hergeir Nielsen
Hilmar Kass
Tórálvur Mohr Olsen
Johannes Martin Olsen
Anfinn Kallsberg
Pauli Ellefsen.

Síðani er tað Marknaðarnevndin, har eru fastir limir:

Henrik Old
Hilmar Kass
Karin Kjølbro
Hergeir Nielsen
Jógvan Sundstein
Pauli Ellefsen
Jógvan I. Olsen.

Tiltakslimirnir eru:

Tórálvur Mohr Olsen
Asbjørn Joensen
Hans Jacob Debes
Øssur av Steinum
Anfinn Kallsberg
Agnar Nielsen
Eilif Samuelsen.

Ynskast nakrar broytingar har?

Jógvan Sundstein (ff.)

Hevði Sambandsflokkurin tveir áðrenn - ein áðrenn, ha?

Formaðurin

Sambandsflokkurin hevði fastar limir:

Paula Ellefsen
Jógvan I. Olsen

Jógvan Sundstein (ff.)

So er tað Olaf Olsen og Jógvan Sundstein. So skulu tveir varamenn eisini og tað er:

Aage Ellefsen
Eyðun Viderø.

Formaðurin

Eru tað nakrar aðrar broytingar?

Agnar Nielsen (sb.)

Í staðin fyri Jógvan I. Olsen Eilif Samuelsen.

Formaðurin

Sum fastan lim í staðin fyri Jógvan I. Olsen Eilif Samuelsen?

Er nøkur onnur broyting? Tað vil siga, at Marknaðarnevndin sær soleiðis út:

Fastir limir:

Henrik Old
Hilmar Kass
Karin Kjølbro
Hergeir Nielsen
Olaf Olsen
Jógvan Sundstein
Pauli Ellefsen

Síðani koma vit til eykamerninar, tað verður helst nakað av tí sama.

Vit prøva tiltakslimirnar.

Tórálvur Mohr Olsen
Asbjørn Joensen
Hans Jacob Debes
Øssur av Steinum

Eyðun Viderø
Agnar Nielsen
Aage Ellefsen

Sostatt sær Marknaðarnevndin soleiðis út.

Nú taka vit fyrst teir fastu limirnar og eg biði um, at tiltakslimirnir bíða til annað umfar. Vit taka fyrst teir føstu limirnar í Fiskivinnunevndini.

Seinast valdir vóru:
Tórálvur Mohr Olsen
Hilmar Kass
Adolf V. Hansen
Signar Hansen
Jógvan Ingvard Olsen
Olaf Olsen
Anfinn Kallsberg

Jógvan Sundstein (ff.)

Hjá okkum er tað so Olaf Olsen.

Formaðurin

Tað vil siga afturval.

Jógvan Sundstein (ff.)

Ja, men ikki afturval av Anfinni Kallsberg. Vit missa ein mann har. Sambandið kemur inn fyri hann.

Agnar Nielsen (sb.)
Jógvan I. Olsen
Ivan Johannesen

Formaðurin

Tað vil siga, at fastir limir í Fiskivinnunevndini verða:
Tórálvur Mohr Olsen
Hilmar Kass
Adolf V. Hansen
Signar Hansen
Jógvan Ingvard Olsen
Olaf Olsen
Ivan Johannesen

Tiltakslimirnir seinast valdir vóru:
Henrik Old
Asbjørn Joensen
Hergeir Nielsen
Heini O. Heinesen
Eilif Samuelsen
Svend Aage Ellefsen
Eyðun Viderø
Broytingar?

Agnar Nielsen (sb.)

Eilif Samuelsen
Agnar Nielsen

Jógvan Sundstein (ff.)

Svend Aage Ellefsen

Formaðurin

Hann var fastur tiltakslimur, so Eyðun Viderø gongur út.

Tað vil siga, tiltakslimirnir í Fiskivinnunevndini verða:
Henrik Old
Asbjørn Joensen
Hergeir Nielsen
Heini O. Heinesen
Eilif Samuelsen

Agnar Nielsen
Svend Aage Ellefsen.

Síðani er tað Rættarnevndin, har eru fastir limir seinast valdir:
Jóánnes Dalsgaard
Jákup Lindenskov
Hans Jacob Debes
Jógvan Sundstein og
Eilif Samuelsen.

Eru ynski um broytingar har?

Tað vil siga, at Rættarnevndin verður afturvald.

Síðani er tað Samferðslunevndin, har eru seinast valdir:
Tórálvur Mohr Olsen
Asbjørn Joensen
Adolf V. Hansen
Heini O. Heinesen
Eyðun Viderø
Agnar Nielsen
Johannes Martin Olsen

Skulu broytingar verða har?

Jógvan Sundstein (ff.)

Har hava vit:
Eyðun Viderø
Svend Aage Ellefsen.

Agnar Nielsen (sb.)

Johannes Martin Olsen.

Formaðurin

Tað vil siga, at Samferðslunevndin sær soleiðis út:

Tórálvur Mohr Olsen
Asbjørn Joensen
Adolf V. Hansen
Heini O. Heinesen
Eyðun Viderø
Svend Aage Ellefsen
Johannes Martin Olsen

So er tað Ídnaðarnevndin. Seinast valdir vóru:
Sverre Midjord
Poul Jacob Olsen
Heini O. Heinesen
Olaf Olsen
Eilif Samuelsen

Nakrar broytingar?

Tað er tað ikki, so er Ídnaðarnevndin afturvald.

So er tað Arbeiðaramálanevndin. Seinast valdir vóru:
Hendrik Old
Thomas Arabo
Øssur av Steinum
Jógvan Sundstein
Ivan Johannesen

Har eru heldur ongar broytingar?

So er Arbeiðaramálanevndin afturvald.

Síðani kemur Skattanevndin. Seinast valdir vóru:
Sverre Midjord
Heini O. Heinesen
Hilmar Kass
Jógvan Sundstein
Agnar Nielsen

Og har verða heldur ongar broytingar?

So er Skattanevndin afturvald.

Almanna- og heilsunevndin.
Seinast valdir vóru:
Jákup Lindenskov
Adolf V. Hansen
Karin Kjølbro
Jógvan Sundstein
Flemming Mikkelsen
Og har verða heldur ongar broytingar, so er Almanna- og heilsunevndin afturvald.

Landbúnaðarnevndin.
Seinast valdir vóru:
Hendrik Old
Øssur av Steinum
Heini O. Heinesen
Eyðun Viderø
Jógvan I. Olsen
Har eru heldur ongar broytingar, so er Landbúnaðarnevndin afturvald.

Mentannar- og skúlanevndin.
Seinast valdir vóru:
Jóannes Dalsgaard
Asbjørn Joensen
Hergeir Nielsen
Óli Breckmann
Eilif Samuelsen
Har eru heldur ongar broytingar, so er Mentannar- og skúlanevndin afturvald.

Landsstýrismálanevndin.
Seinast valdir vóru:
Hergeir Nielsen
Thomas Arabo
Flemming Mikkelsen
Har verða heldur ongar broytingar, jú, har verða broytingar.

Jógvan Sundstein (ff.)

Er tað ikki har vit skifta?

Formaðurin

Har hevur verið skift, jú.

Jógvan Sundstein (ff.)

So verður tað Óli Breckmann.

Formaðurin

Tað vil siga, at Landsstýrismálanevndin sær soleiðis út:
Hergeir Nielsen
Thomas Arabo
Óli Breckmann

Umhvørvisnevndin.
Seinast valdir vóru:
Jóannes Dalsgaard
Hans Jacob Debes
Øssur av Steinum
Anfinn Kallsberg
Jóhannes Martin Olsen
Har eru heldur ongar broytingar, so er Umhvørvisnevndin afturvald.

Norðurlandaráðið.
Seinast valdir vóru:
Jákup Lindenskov
Agnar Nielsen
Nakrar broytingar?

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Vit skjóta upp Jógvan Sundstein sum fastan lim og Anfinn Kallsberg sum varalim.

Formaðurin

Tað vil siga, at fastir limir í Norðurlandaráðnum verða:

Jákup Lindenskov
Jógvan Sundstein

Tiltakslimir verða:

Jóannes Dalsgaard
Anfinn Kallsberg

So er tað Tingmannaráð útnorðurs. Har vóru seinast valdir fastir limir:

Thomas Arabo
Hans Jacob Debes
Asbjørn Joensen
Tordur Niclasen
Jógvan Sundstein
Agnar Nielsen
Adolf V. Hansen

Tiltakslimir vóru:

Jóannes Dalsgaard
Karin Kjølbro
Hilmar Kass
Tórálvur Mohr Olsen
Anfinn Kallsberg
Pauli Ellefsen

Har er einki ynski um broytingar. So er Tingmannaráð útnorðurs afturvalt.

So vóru ikki fleiri mál til henda fundin.

Næsti fundur verður mikudagin, 17. august 1988, kl. 10°°, tá kemur til viðgerðar:

Ein viðgerð av løgmansrøðu og framløga.

So er hesin fundurin lokin.

3. fundur

Mikudagin hin 17. august 1988, kl. 10°°

Formaðurin

Tingfundurin er settur og skrivarin lesur gerðabókina frá seinasta fundi.

Gerðabókin góðkend.

Skriv frá Jóannes Dalsgaard:

Av tí at eg verði burturstaddur í almennum ørindum, heiti eg á løgtingið um at lata næsta vælevni á lista javnarfloksins úr Suðurstreymoy taka sæti á tingi frá 17. august og 7 dagar fram.

Næsta vælevni á lista javnarflcksins í Suðurstreym er Jona Henriksen, hon hevur tikið sæti á tingi fyrr í hesum valskeiði. Teir tingmenn ið greiða atkvøðu fyri, at Jona Henriksen tekur sæti, verða bidnir um at reisa seg.

21 atkvøður fyri at Jona Henriksen tekur sæti á tingi.

Tvey takkarskriv:

Frá Nordisk Kontakt fyri móttøku í Tinghúsinum 3. august í ár.

Frá Norsk Færøsk Lag fyri móttøku umborð á Smyrli í Oslo tann 30. juli í ár.

Skriv viðvíkjandi telefonviðurskiftinum í Eysturoy dagfest 2. august 1988, teir vísa til áheitan á Føroya løgting tann 7. mars 1988 og senda samb. viðtøkur í bólkinum á fundi 13. juli frásøgn frá nevnda fundi og notat um telekombinationsviðurskiftini í Eysturoynni til kunningar.

Skrivið beint til Føroya Landsstýri.

Tann 12. august 1988 fingu vit deyðsboðini av Fredrik Hansen, fyrrverandi løgtingsmanni.

Frederik Hansen varð føddur í Leirvík tann 3. januar 1910, og búði nesta av æviskeiði sínum í Søldafirði. Sum so mangur annar tá í tíðini fór hann til skips 14 ára gamal, og var hann ein av teimum, ið royndu við deyðsiglara í Grønlandi og eisini upp í ta tíðina, tá tey nýggju stállínuskipini komu. Sum fiskismaður sýndi Frederik Hansen samhugadirvi við statti sínum og var hann ein av hollastu stuðlunum hjá Føroya Fiskimannafelag, tá harðast leikaði á.

Í tíðini aftan á veraldarbardagan fyrst sum sýsluformaður og síðani sum nevdarlimur eina tíð eisini næstformaður. Eisini var hann í 12 ár virkandi í komunalpolitikki, harav fimm ár sum formaður. Frederik Hansen var limur í SEV-stýrinum í mong ár

og eisini í nevndini fyri Føroya Vanlukkutryggingarráð. Frederik Hansen var ein av bestu stuðulsmonnum tjóveldisfloksins og varð valdur inn á ting í Eysturoy í 1954 sum hann umboðaði til 1970. Í tingarbeiði sinum legði Frederik Hansen dent á at fremja áhugamálini hjá arbeiðara- og fiskimanna-stattinum.

Í tøkk fer løgtingið at minnast hendan føroying, ið var ein av teimum, ið slóðaði fyri øktari vælferð hjá arbeiðs- og fiskimanninum í hvørjari søk bardust fyri at fremja áhugamál, ið hann umboðaði sum tingmaður, sum tann reiðiligi og framfýsni maður hann var.

Vit lýsa frið yvir minni um Frederik Hansen.

Í tøgn.

Síðani verður farið undir viðgerð av løgmansrøðuna. Og eg skal siga frá at útvarpi tekur orðaskifti upp á band og talitíðin fyri framsøgumenn flokkana og landsstýrislimir og ríkisumboðsmannin er fyrstu fer 20 minuttir aðru fer 10 minuttir og síðan 5 minuttir hvørja fer, og fyri vanligar tinglimir er talutíðin 15 minuttir fyrstu fer og 10 minuttir aðru ferð og síðan kunnu viðmerkingar koma so sum monnum hugar tað.

Signar Hansen

Harra formaður.

løgmansrøðan ið er til viðgerðar í dag, er tann seinasta í hesum valskeiði og røðan er merkt av tí, við tað at løgmaður ikki bert umrøður tað, ið er farið fram seinastu árini, men hann viðger hettar valskeiðið í síni heild. Løgmansrøðan, ið er umleið tær 22 síðurnar, har so at siga øll mál verða nágreiniliga viðgjørd. Í hesi talitíð, sum eg havi, fari eg loyva mær at nema við nøkur av teimum málum sum eru umrødd í hesari røðu. Tað er soleiðis, at tey seinastu árini hevur tað verið siður, at tær landsstýrissamgongur, sum eru skipaðar, hava gjørt eitt samgonguskjal, har sett verður upp, hvørji mál ið loysast skulu í tí valskeiði, hon situr. Sítandi samgongan setti sær slíkan setning og tað jú so heilt natúrligt, at hugt verður eftir, hvat vit nú hava fingið av skafti og hvørji mál, ið eftir eru at loysa, nú valskeiðið er við at verða runnið út.

Málini vóru mong, ið sítandi landsstýrisamgonga setti sær fyri at loysa, og mong teirra vóru stórmál. Sitandi landsstýrissamgonga setti sær sum eitt av teimum mongu málinum at fáa bøtt um tey viðurskifti, ið valdaðu, tá hon tók við, eina stóra uttanlandasskuld uppá 3 milliardir og einum rættiliga stórum halli á fíggjarlógini.

Hyggja vit at tí tal tilfari, ið er viðlagt løgmansrøðuni, so siggja vit millum annað, at í fíggjarárinum 1984/85 var eitt landskassahall uppá umleið 60 mió.kr. Í 1986 var eitt avlop uppá 257 mió.kr. og í 1987 eitt avlop uppá 290 mió.kr., harumframt eru 90 mió.kr. lagdar í oljugrunnin. Játtanir til grunnar at standa ímóti, tá gekst ímóti, vórðu hækkaðar munandi, og her hugsi eg fyrst og fremst um veðhaldsgrunnin. Hetta hevur gjørt, at landið hevur verði ført fyri at lagt út, tá ið neyðugt hevur verið. Uttanlandsskuldin við árslok kemur at liggja umleið 4,6 mia.kr. og gjaldsjavnahalli verður vantandi einar 700 mió.kr.

Hesi tøl eru framvegis ov høg, hóast vit kunnu ugga okkum við, at hetta er 1 mia.kr. ella 1½ mia.kr. minni, enn roknað varð við í árinum 1984. Seinasta fíggjarár var gjaldsjavnahallið niðri á 300 mió.kr.

uttanlandaskuldin góðar 3,8 mia.kr. Í yvirlitinum siggja vit, at útflutningstølini fyri 1987 eru lækkað munandi, og verður hettar eisini umrøtt av løgmanni.

Vit fáa at vita, at fiskaloysið eystanfyri og eitt ávíst prísfall á saltfiski bera í sær, at 3 túsund tons færri eru útflutt og at virðið er minkað við 75 mió.kr.

Vit hava somuleiðis havt trupulleikar við alivinnuni, ið varð rakt av sjúku (felli) soleiðis, at ein útflutningsvøkstur uppá 3 - 400 mió.kr. er skotið fram til 1989-1990.

Tað hevur verið funnist at eisini sitandi samgongu, at hon hevur gjørt ov stórar íløgur til millum annað skip. Hesar atfinningar eru partvíst rættar, vit hava tikið ov rívan til í skipaíløgum og tað gerst upp aftur hugstoytt, tá partur av teimum skipum, ið vit høvdu vónir um vóru at greiða sínar skyldur ikki megnaðu tað. Tað, sum eg hugsi um í hesum sambandi, er svartskjaftaskipini. Tó taka vit í tjóveldisflokkinum fult undir við tí, tá sagt verður um hesa vinnu, at vit eiga ikki at sleppa endanum her, men vit eiga framhaldandi at arbeiða soleiðis, at hendan vinna fær livilíkindir.

Undir tí parti, ið kallast fíggjarstøðan verður sagt, at sum fleiri ferðir áður ávist, er landskassin sera viðbrekin mótvegis spekulatión í rentuskattaskipanini.

Búskaparfrøðingar tala meira og meira um tað órímuliga í, at tað ber til læna til uppsparing. Tað hevur vundið nógv uppá seg at læna uttanlands til at seta inn í føroyskar peningastovnar, hettar minkar um møguleikan at lætta um hjá teimum, ið noyðast at læna fyri t.d. at fáa tak yvir høvdið. Rætt er tað, at hesin spurningur hevur fleiri ferðir verði umrøddur, men einki er hent og ongar broytingar eru enn gjørdar. Tá ið støðan er soleiðis vorðin, at rentuspekulatiónin vindur upp á seg, so eiga vit ongartíð og skjótt at steðga tílíkum.

Tað, at fólk fingu loyvi at draga frá rentur í samband við skattauppgávuna, var fyrst og fremst ætlað teimum, ið settu búgv, og var hettar eitt gott tiltak, slíkt misbrúk, sum tað í nevnd er í løgmansrøðuni, eigur at verða stegðað beinanvegin og eg kann siga vegna Tjóveldisflokkin, at flokkurin er altíð til reiðar at taka hendan spurningin upp og vil fegin, at hesin spurningur verður avgreiddur í hesari tingsetuni, hóast tíðin er stutt. Í seinastu tingsetu

hevur fiskivinnan sum heild fingið drúgva umrøðu, serliga støðan hjá útróðrarflotanum hevur verið nógv frammi. Á løgtingsins fíggjarlóg vórðu avsettar seinast 265 mill.kr., sum skuldu millum annað nýtast til studning til hesa vinnu, men tíðliga í vár dugdu vit at siggja, tá í prísirnir á heimsmarknaðinum lækkaðu, at hesin peningur kom ikki at røkka til. Í eykatingsetini í varð hildin um miðan juni, varð hetta mál viðgjørt og avgreitt í tinginum. Løgtingið gav landsstýrinum heimild landskassans vegna at veita ráfiskagrunninum neyðugan pening soleiðis, at avreiðingarprísurin kundi hækka við upp til 5% frá 1. juni at rokna. Harumframt varð landsstýrinum heimilað at økja játtanina til aðrar grunnar og nevndir, sum høvdu til endamáls at minka um veiðutrýstið á landleiðini og at stuðla veiðiháttum, ið minka um orkuna í botnfiskaveiðuni undir Føroyum og hækka um virkingarstigan og økja um útflutningsvirðið. Peningurin skuldi fáast til vega av tí avlopi, ið landskassin hevði havt í 1987 og í tí avlopi, ið væntast at verða í fíggjarárinum 1988. Umframt hetta samtykti løgtingið at læna 30 mió.kr. úr oljugrunninum til at nýta til upphøggingargrunn, ið stóð í 40 mió.kr. frammanundan, soleiðis at vit tilsaman her høvdu tær sjeyti milliónirnar. Løgtingið álegði landsstýrinum somuleiðis at broyta reglugerðina fyri henda grunn soleiðis, at áhugi var skaptur fyri at gera nýtslu av honum og at grunnurin kom at gerða tað nyttu, nevnliga at skip, sum tyngja um búskapin ella ikki geva nóg stórt búskaparligt avkast og sum trároyna stovnarnar meira enn gott er, verða at taka úr flotanum. Reglugerðin er tíverri ikki broytt enn, men tann gamla stendur tó við, hesar reglur skuldu verið fyri langari tíð síðan verið settar í gildi, helst kanska fyri einum tveimum árum síðani soleiðis, at vit fingu nakað burtur úr hesum grunni. Men hóast hetta er seint, so er at vóna at vit fáa broytt hesa reglugerð og at farið verður undir at kanna, hvørjir møguleikar eru til at gera brúk av nevnda grunni soleiðis, at vit kunnu minka um tað alt ov stóra trýst, sum er á okkara grunnum.

Harra formaður.

Fyri stuttum frættu vit at, møguleikar hjá føroyingum at fara til Grønlands við einum ávísum tali av útróðrarbátum, vóru í

eygsjón, og hetta var eftir at umboð fyri grønlendska heimastýrið vitjaðu í Føroyum. Hetta var ikki nevnt í løgmansrøðuni av tí orsøk, at hetta er vist ikki hent fyrr enn aftaná, at løgmansrøðan er hildin, men løgmaður hevur nevnt fyri útvarpinum, at her vóru møguleikar til at lata nakrar av okkara bátum, sum royna á grunnum, fara yvir til Grønlands at rógva út part av árinum, og tað er fyri so vítt positivt og gott og vist rætt. Men í hesari somu samrøðu kom løgmaður á tal um, at møguliga skuldu føroyingar gera íløgu í Føroyingahavnina aftur. Nú dugi eg kanska ikki at endurgeva hetta her heilt rætt, men tað hevði í hesum sambandi verið áhugavert at fingið at vita frá løgmanni, hvat ið veruliga er hent í teimum samráðingum, sum eru farnar fram millum grønlendska ríkisstýrið og landsstýrið.

Harra formaður.

Vit í Tjóðveldisflokkinum fegnast yvir ta samtykt, sum varð gjørd í tinginum í juni mánaði, ið gjørdi tað møguligt at hækka avreiðingarprísirnar av fiski við teimum 5%, somuleiðis eru vit fegnir yvir, at stig nú veruliga verða tikin, ið miðað í móti at minka um tað harða veiðutrýstið. Eg vóni at tann samtykt, sum vit gjørdu og tær áheitanir sum, vit gjørdu í juni mánaði, at tær verða fylgdar upp. Nú veit eg væl, at tað er stutt tíð frá hálvum juni til dagin í dag, men tað verður eisini sagt at hetta málið skuldi leggjast fram aftur í ólavsøkutingsetuni, men tað hevði verið ógvuliga áhugavert at fingið at vita frá løgmanni, hvat er hent, síðani hetta mál varð samtykt, hvat hava landsstýrið og Fiskivinnustovn gjørt á hesum øki? Eru tey mál og tær áheitanir sum løgtingið hevði á landsstýrinum er partur av teimum, eru tær fylgdar og kunnu vit hóma nøkur úrslit av teimum áheitanum sum vit komu til í juni mánað? Tað hevði verið áhugavert og eg vóni at løgmaður eisini her fer at geva okkum eina frágreiðing um hesi viðurskiftir.

Harra formaður.

Tað hevur verið nógv framm undir teimum seinastu tingsetunum og tað hevur ljóðað allastaðini, at okkara fiskivinnufloti er í stórari kreppu. Reiðarafelagið gav frágreiðing bæði í figgjarnevndini, í fiskivinnunevndini og í landsstýrinum og hevur greitt frá teirra ómetaliga torføru støðu okkara veiðufloti var í. Uppskot um eina serlánsskipan vórðu borðin fram á tingborð

bæði av andstøðu og somuleiðis av samgongu. Eg má siga, at eftir tí sum man hevur hoyrt so hevur man trúð tí, sum er ført fram, at støðan hevur verið torfør, men tá eg so lesi løgmansfrágreiðingina her, so sær út til, at her haltar og tað í stórum, tí fari eg at taka eitt brot úr tí, sum løgmaður sigur um støðuna hjá veiðiflotanum í síni heild. Hann sigur soleiðis, við formansins loyvi.

Rakstrartølini fyri 1987 sýna fyri flestu skipabólkar frægari úrslit enn árini fyri og hetta hóast slakari veiðu á Føroya-leiðunum. Tær umsóknir um serlán, ið innkomnar eru, prógva eisini, at ikki stendur so illa til í vinnuni, sum prestar prædika.

Tað eru politikarar og bløð, sum hava tikið sær rættin til at áseta ella definera, at fiskivinnan við Føroyar eru í eini djúpt gangandi kreppu og djýpri enn nakrantíð fyrr. Henda rættin eiga teir ikki og fáa hann heldur ikki, hartil er slík tala heilt burturvið.

Tá ið løgmaður tekur so harðliga og avgjørt til orðanna um hettar, so hevur hann sjálvandi naka at byggja síni úttalilsir upp á.

Nú hava tingmenn ikki sæð allar tær umsóknir, sum eru innkomnar um serlán, eg skilji at tær eru ikki nógvar í tali, og tað hevði eisini verið áhugavert at fingið at vitað frá løgmanni, hvussu leiðis viðurskiftini eru her, hvussu nógvar umsóknir eru komnar um serlán, og hvussu hesu tølini síggja út, tí er tað verðuliga so galið, at tað, sum reiðarafelagið, og tað, sum summir prestar og summir politikarar hava borið fram her í tinginum, er heilt við síðirnar av, so haldi eg at tað er fariðheilt langt út.

Sitandi samgonga setti sær millum annað fyri at skapa íðnaðinum betri umstøður at virka undir, og fitt er komið av skafti, so sum menningastova fyri íðnað og handverk og annað er sett á stovn.

Sáttmálastovnur hóast í seinna lagi, ið skal hava eftirlit við og luttaka í gerð av skipabyggisáttmála, sum hitt almenna luttekur í, er eisini samtyktur. Hóast bøttar umstøður, so hevur tann føroyski íðnaðurin tungt við at verða kappingarførur við tann útlendska, ...eftir løgmansrøðuna at sagt verður millum annað, at alt ov ofta fara fleiri undir somu framleiðslu við tí úrsliti, at trupult er hjá nøkrum at klára seg. Jú, mong eru dømini um slíkt, men tað, sum undrar meg í hesum førum er, at tá ið vit í dag hava fleiri grunnar og

og stovur, ið eru rágevandi og veita lán og sum hava reglur at ganga eftir, hvussu ber tað so til hjá hesum grunnum at kunna veita lán til fleiri og fara undir somu framleiðslu. Slíkar ídnaðarfyritøkur skulu jú hava fígging frá nevndu grunnum, ti bert at fáa lán frá bankunum visir seg at verða trupult, gjarna er tað so, at bankarnir treyta sær, at viðkomandi umsóknir hava fingið studning, bæði úr Menningargrunninum og Ídnaðargrunninum. Vit fáa upplýst, at Ídnaðargrunnurin hevur ikki møguleika at veita lán við rímuligari rentu soleiðis, sum menningargrunnurin kann tað. Viðari sigur løgmaður, at landsstýrið umhugsar at bøta um møguleikarnar hjá hesum grunnum, soleiðis sigur løgmaður, tá hann umrøður málið um at seta almennan partapening virkir, har serligur tørvur er á arbeiðsskapandi tiltøkum, at landsstýrið umhugsar at biðja tingið samtykkja eina heimildarlóg soleiðis, at landsstýrið saman við løgtingsins figgjarnevnd kann seta upp í 20% av partapeninginum í slík virkir. Tíðin hjá hesari samgongu er við at verða runnin út, og tíðin hjá landsstýrinum at umhugsa er eisini við at verða runnin, tankarnir í hesum eru góðir og tí meini eg, at hesi mál áttu at verið tikin fram, tað skuldi verið gjørt beinanvegin, soleiðis at hesir grunnar kunnu virka, sum ætlanin var.

Harra formaður. Í løgmansrøðuni verður eisini rættiliga nógv gjørt burturúr skúlamálum. Tað er soleiðis, at tey seinast tíggju árini vil eg siga, er ógvuliga nógv hent á skúlaøkinum, og í tingsetuni í 1978 eydnaðist tað hjá okkum fáa Skúlafyrisitingina tikna yvir á føroyskar hendur, hetta var ein stór hending, vit í Tjóveldisflokkinum løgdu stóran ćent á at fáa framda. Eg hugsi, ongantíð áður er so nógv hent á skúlaøkinum, sum júst síðan hendan yvirtøkan varð framd. Mong av teimum málum, eg vil siga vóru misrøkt vóru tikin upp til viðgerðar og loysnin varð funnin. Undir hesum valskeiðnum eru eisini nógvar hendingar farnar fram, útbyggingar av virnuskúlunum teknisku skúlunum, handilsskúlin er í gongd og ikki gongur drúgv tíð, til hesir skúlar standa lidnir. Í seinastu tingsetu viðgjørdu vit ein hóp av skúlamálum, ið øll vórðu samtykt, vit avgreiddu málið um eina landsmiðstøð fyri undirvísingarverk. Tað hevur

eydnast veita størri studning av fíggjarlógini til undirvísingartilfar til skúlarnar soleiðis, at her er rættilig gongd komin á. Nevndin, sum skal gera uppskot um nýggjar lesiætlanir fyri fólkaskúlan og endurskoða fólkaskúlalógina, er komin væl áleiðis við sínum arbeiði. Somuleiðis tann serundirvísingnevnd, ið er sett at arbeiða við serundirvísingini, hvussu hon skal leggjast til rættis, hvussu samarbeiðast skal við serskúlan á Trøðni, hon er eisini komin væl áleiðis í sínum arbeiði, og her trongir eisini til, at vit fáa broytt viðurskiftir.

Á mentunarøkinum eru stórhendingar farnar fram. Málið um at stuðla málið hjá mentunargrunninum er nú avgreitt, nýggjar reglur eru skipaðar og peningur á fíggjarlógini er munandi hækkaður. Hetta hevur borið í sær, at munandi meira verður givið út av føroyskum bókum enn frammanundan. Málið um at menna Fróðskaparsetur Føroya er somuleiðis gjørt, hóast vit enn ikki eru náddir á mál, so tað sum eg hugsi í hesum sambandi er, at hølisviðurskifti hjá hesum stovni eru alt ov vánalig, og tí má tað verða eitt tað fyrsta, vit mugu fara undir, tað er at bøta um hesi viðurskifti.

Sjónvarpi Føroya hevur havt sera vánalig viðurskifti at arbeiða undir. Í røðu løgmanns fyrr varð boðað frá, at landsstýrið arbeiðir við at útvega sjónvarpinum onnur hølir. Eftir at løgmansrøðan var hildin, hava fjølmiðlarnir boðað frá, at landsstýrið hevur fingið til vega annað hóskandi hús til sjónvarpið at starvast í. Tí kenni eg ikki nógv til hesa ætlan, málið hevur ikki verið viðgjørt í fíggjarnevndini og tí hevði verið áhugavert at fingið at vita frá løgmanni, hvat ið er hent í hesum málið. Ella kundi landsstýrismaðurin ið umsitir hetta málið, greitt okkum meira frá tí.

Eg havi nevnt, at nógv vóru málini, ið henda samgongan setti sær fyri at loysa, og mong av teimum eru loyst, men tó eru mál eftir at loysa, sum mugu roknast sum stórmál. Eitt av hesum er tað stóra og týdningarmikla málið um undirgrundina.

Tjóðveldisflokkurin leggur alstóran dent á at fáa hetta málið loyst, og skal tað verða loyst á tann hátt, sum Føroya løgting hevur samtykt, at tað skal loysast nevnliga, at

málsøkið undirgrund og havbotnur verða yvirtikin sum sermál. Samráðingar hevur áður havt við danir um hesa yvirtøku av hesi samgongu og seinastu samráðingar góvu ikki nakað úrslit. Heldur ikki hesa ferð vildu danir ganga við til ta loysn, ið vit krevja, og sum tingið hevur samtykt. Á fundi, sum hevur verið frammanundan, tað vil siga, sum tann borgarliga samgongan hevði við donsku stjórnina, varð víst av dønum, at tað vóru juridiskar og tað vóru lógfrøðiligar forðingar fyri, at talan kundi verða um eina yvirtøku av havbotni og undirgrund. Eftir hendan fund varð ein nevnd sett av føroyingum, løgfrøðingum at kanna m.a. tað, ið danir høvdu borið fram um lógfrøðiligar forðingar fyri hesi yvirtøku. Nevndin kom til eina aðra støðu, at tað vóru ongar forðingar fyri hesi yvirtøku. Tá ið hetta var borið fram fyri donsku ríkismynduleikarnar seinast, ið samráðingar vóru, tá var framvegis sagt av dønum, at teir vildu ikki ganga við til ikki eina yvirtøku, men teir vóru fúsir til at samráðast um aðrar loysnir. Løgmaður umrøddi hetta málsøkið í síni røðu. Sagt verður í løgmansrøðuni, at nýtt álit er framlagt í málinum, ið skal leggjast fram undir teimum samráðingum, ið fara fram við danir í næstum.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur lagt hesi álit fram, hevur útvegað okkum prógtilfar og lýsir spurningin úr fólkarættarligum, ríkisrættarligum sýni og annars við atliti til møguligar avtalur, sum gerast mugu við danir, áðrenn yvirtøkuna. Hetta tilfar er av slíkari náttúru, at tað verður ikki almannakunngjørt, áðrenn samráðingar hava verið.

Vit í Tjóðveldisflokkinum vóna, at danir hesa ferð vísa virðing fyri teimum samtyktum, ið Føroya løgting hevur gjørt, og at veruligar samráðingar fara fram um eina yvirtøku. Aðrar loysnir, ið vóru bornar upp á mál undir seinastu samráðingunum, fer Tjóðveldisflokkurin undir ongum umstøðum at ganga við til.

Harra formaður, tíðin er farin. Tað vóru onnur mál, ið eg ætlaði at nema við, men tað havi eg høvi til at gera undir einum seinni umfarið.

Takk fyri.

Jógvan Sundstein (ff.)

Harra formaður.

Løgmaður heldur sína árligu røðu á Ólavsøku og tað skal hann gera sambært okkara stýrisskipan.

Hesaferð

er tað tann seinasta røðan í hesum valskeiði og tíðkil ið hvussu er, tann seinasta røðan, sum løgmaður í hesum landsstýri.

Tá ið røðan nú kemur til viðgerðar her í dag, er løgmaður til staðar her í tinginum, men vit siggja, at hinir 5 landsstýrismenninir eru ikki her, og løgmansrøðan er væl eitt politiskt dokument frá sitandi samgongu, frá sitandi landsstýri og tí hevði tað verið nátúrligt, at allir landsstýrismenninir, sum hava ábyrgd av hvør sínum málsøki, vóru her, soleiðis, at teir partvis hoyrdu tað, sum sagt verður um tey ymisku málsøkini og høvdu møguleika at svara upp á teir spurningar og tær viðmerkingar, ið koma um hesi øki. Tað vísir eina rættiliga stóra politiska líkasælu frá samgonguni og landsstýrinum, tá ið teir persónar, sum hava tað beinleiðis ábyrdina av teimum ymisku málsøkjunum sum, verða viðgjørd í hesi røðu, sum her er til viðgerðar, ikki møta upp í tinginum.

Røða løgmans er nærmast at kalla eitt resumé, ein samandráttur av tí, sum er farið fram tey seinastu fýra árini. Tað er lítið av nýggjum hugsanum, lítið av nýggjum tankum, lítið av perspektivum í røðuni, tað er ein uppramsan av ymiskum, sum hent er, og tað skal tað sjálvandi eisini verða, men tað hevur eisini verið í røðuni tey farnu 3 árini. Tí hevði tað væl verið upp á sítt pláss, at man fekk at vita eitt sindur um tær hugsjónir, ið sitandi samgonga hevði, og um møguleikan hjá hesi samgongu, ið hvussu so er partar av henni, at komi við nøkrum politiskum uppleggi inn í sjálva viðgerðina nú val skal verða 8. november.

Í frágreiðingini frá løgmanni verður sagt, at við formansins loyvi kann eg kanska citera av og á burtur úr røðuni, takk fyri.

Í løgmansrøðuni stendur, at tær ov stóru íløgurnar eru høvuðstrupulleikin í føroyskum politikki í dag. Eg eri samdur við løgmenn, at tær stóru íløgurnar í føroyska samfelagnum er ein stórur trupulleíki í føroyskum búskapi í dag. Men, eg haldi, at løgmaður fer alt ov lætt um tann stórsta trupulleikan nevnliga tað, at okkara vinnulív ikki hevur nóg góða inntjening. Tá ið vinnulívið ikki hevur møguleika fyri at vinna pening, ikki hevur møguleika fyri at standa seg rakstrarliga, so er fyrsta grundarlagið undir einum sterkum samfelagsbúskapi burtur.

Vit kunna so diskutera orsakirnar til, at vinnulívið ikki hevur henda møguleikan.

Fyrsta orsøkin er væl tann, at tað er tilfeingið, sum manglar, tað vita vit og tað er ein av teimum størstu uppgávunum hjá einum og hvørjum sitandi politiskum stýri her á landi, at bøta um hesi viðurskiftir. Vit vita eisini, at okkara primervinna, fiskivinnan, tað er ein vinna, sum kann samanlíknast við primervinnur í øðrum londum og í øðrum samtøkum av londum.

Vit vita eisini, at henda vinna í øðrum londum verður subsidera hon fær stóran stuðul frá stjórnum og felagsskapum aðrastaðni. Vit vita, at henda vinnan er í eini kapping við onnur lond, sum geva slíkum vinnum, og tá er tað serliga landbúnaðurin, stóran stuðul, og tað mugu vit eisini siggja í eyguni, tá ið vit viðgera hetta málið. Tað er ov flott av løgmanni, tá ið hann endar røðuna við og sigur, at vit gykla heldur ikki, at tað ber til at fremja veruligan vinnulívspolitikk heldur ikki sokallaðan vinnulivsvinarligan bert við at troðka fram at landskassanum. Hesin skal hvørki hava hol í botni ella lok, sum fýkur av, tá tað lotar úr hanakjafti. Eg haldi hetta er ein nóg so flott viðmerking av landsins stjórnarleiðara í endanum av hansara seinastu røðu sum stjórnarleiðari í hesum valskeiði í øllum førum.

Tá ið vit skulu siggja hetta í tí internationala perspektivi ið okkara vinna arbeiðir undir, so kunnu vit eisini spyrja, hvussu hetta samsvarar hetta við politikkin hjá landsstýrinum tey farnu árini. Jú, tað var eitt erklerað mál frá landsstýris síðu, at fiskivinnan skuldi hava minni stuðul frá almennari síðu úr landskassanum. Tað er í sær sjálvum rætt, um vinnan annars veruliga hevur viðurskifti, sum gera, at hon hevur nóg góða inntjening, tað er klárt. Men hesin stuðul minkaði hesi 3 árini undir hesum landsstýri, men nú er vinnan komin í eina djúpa kreppu, hon er í ein virkuliga djúpari kreppu, sjálvt um løgmaður sigur nakað annað í løgmansrøðuni. Henda kreppan er ikki minst vesnað tað seinasta hálva árið ella seinastu mánaðirnar. Tað at kreppan var, gjørdi tað, at tingið varð innkallað til eykatingsetu í juni mánað og skuldi viðgera støðuna hjá fiskivinnuni. Tað varð eitt uppskot lagt fram av Fólkaflokkinum um ein ávísan stuðul til fiskivinnuna. Hetta uppskot soleiðis sum tað var lagt fram varð feigað av borðinum av samgonguni og í staðin varð samtykt ein lóg av samgongumeirilutanum, sum gav

landsstýrinum óavmarkaða heimild til at stuðla fiskivinnuni.

Henda heimildin hevur so ført við sær at ávísir nýggir hægri prísir er ásettir og størri stuðul verður latin úr landskassanum til fiskivinnuna nú í hesum fíggjarárinum 1988, sum er seinasta ár hjá hesum landsstýrinum. Tað vil siga, at landsstýrið hevur ført ein politikk, sum ger, at fiskivinnan hevur fingið minni og minni stuðul tey fyrstu árini, landsstýrið hevur sitið. Tá ið so kreppan er nóg stór, so kemur tingið saman og viðtekur meir stuðul úr landskassanum soleiðis, at ta síðstu tíðina undan valinum kann man ávísa: ja, men nú rinda vit so og so nógv til fiskivinnuna fyri at hjálpa henni burtur úr, her skulu tit siggja, hvussu góðir vit eru við hesa vinnu. Hetta er ein politikkur, sum eg ikki haldi sømir seg politikarum, flokkum og landsstýri sum skal føra ein sámuligan og landsgagnandi politikk. Tað hevur verið ført fram eisini, at búskaparviðurskifti landsins eru nógv batnað undir hesum landsstýrinum, og ein av høvðusprógvførslunum fyri, at hetta er so, hevur verið, at uttanlandsskuldin er ikki so nógv økt, sum menn høvdu væntað. Nú veit eg ikki, hvat menn høvdu væntað, eg veit væl at Atli Dam væntaði eitt ella annað undir seinasta valstríði fyri løgtingsvali men hann hevur væl ikki diffinitiónsrættin, sum eg skal koma inn á aðra staðni í røðuni, sum hann nevnir, hann hevur val ikki difinitiónsrættin upp á, hvussu stór uttanlandskuldin skuldi verið ella átti at verið við árslok 1988. Men vit vita, hvat uttanlandsskuldin var við árslok 1980, vit vita hvat, uttanlandsskuldin var við árslok í 1984 í heila tikið við árslok øll hesi árini og vit vita í hvussu so er, hvat uttanlandsskuldin var við árslok 1987 og nøkulunda vita vit hvat hon verður við árslok 1988. Taka vit hesi tølini, so siggja vit, at uttanlandsskuldin er økt munandi hesi árini, eins og hon øktist rættiliga munandi undir seinasta landsstýri frá 1981-1984. Tað er sum ført verður fram ja uttanlandsskuldin er økt nógv minnið. So kunnu vit hyggja at orsøkunum til, at hon er økt minni enn, hon gjørdi undir seinasta landsstýri og har siggja vit fyrst, at undir seinasta landsstýri frá 1980-1984 øktist uttanlandsskuldin við smáum

2 mia.kr. harav vóru ca. 500 mió.kr. kursbroytingar og eg eri eisin samdur í, at kursbroytingar er eisini ein økt skuld í øllum førum um tær eru, tá ið skuldin skal rindast, men kursbroytingar er hóast alt nakað, sum hvørki landsstýrið ella løgtingið ella føroyskir mynduleikar hava nakra ávirkan á, Tað vil siga, at við somu kursum hevði uttanlandsskuldin verið økt við ca. 1500 mió.kr. undir seinasta landsstýri. Taka vit so kursbroytingarnar undir hesum landsstýrinum, so siggja vit, at 275 mió.kr. eru í kursvinningi, tað vil siga, at kursirnir eru batnaðir á okkara uttanlandslánum. Taka vit tá og siga, um uttanlandsskuldin undir hesum landsstýrinum hevði havt sama kurs, sum hon hevði, tá hetta landsstýrið tók við, so var hon økt við milum 18 og 1900 mió.kr. tað vil siga, tá ið vit taka kursbroytingarnar burtur, so er uttanlandsskuldin undir hesum landsstýrinum økt við 400 mió.kr. meira enn undir hinum landsstýrinum, og so er tað líka sum, alt gassið fer av balónini um hesi viðurskifti, men vit vita eisini, at undir hesum landsstýrinum er ein stórur partur av okkara farmaskipaflota farin av landinum undir rættiliga syrgiligum umstøðum. Tað hevur beinleiðis havt eina ávirkan uppá uttanlandsskuldina, við tað at ca. 150 mió.kr. av okkara táverandi uttanlandsskuld nú eru avskrivaðar og mistar av teimum útlendsku kreditorunum og tí inntøkuført í valutaroknskapinum hjá okkum hesi árini, tað er aftur ein postur, sum eksordinert hevur bøtt um hesi viðurskifti uttanlandsskuldina í hesum valskeiði.

Vit høvdu trupulleikar undir seinasta landsstýri. Vinnulívi hevði trupulleikar sum fyrr, tá tað snúði seg um fiskivinnuna, fyri ein nokk so stóran part bleiv hjálpt frá almennari síði.

Farmaskipaflotin, sum júst tá var konin, kom í trupulleikar undir hesum landsstýrinum og tað bleiv so ikki hjálpt upp á hesar trupulleikar, so hesi skip, hesi aktiv fóru av landinum. Tað er so ein støða at hava, tað er so ein politisk støða at hava og tann gerðin fær so onga vend. Tað kann so altið diskuterast, um tað var rætt at investera í hesi farmaskip og hevði tað gingið betur og marknaðurin verið betri, so hevði tað verði rætt. Nú gekk tað illa og so sigur man, at so var tað ikki rætt. Undir hesum landsstýrinum hevur man so í staðin investera

í nógv stór og dýr fiskiskip. Ein stórur partur av hesum fiskiskipum kosta líka nógv og meira, enn farmaskipini kostaðu. Her er heldur ikki rentabilitetur í rakstrinum fyri ein stóran part, og summi av hesum skipum, eru komin og koma í økonomiskar trupulleikar.

Nú eru bara 3 mánaðir eftir av hesum landsstýrisskeiðnum og tí kann tað verða, at henda samgongan sleppur undan at taka støðu til tey problem, ið koma av hesum trupulleikum, men tað verður so ein og hvør onnur samgonga, sum tekur støðu til tað aftan á valið. Her er so aftur spurningurin, um man frá politiskari síðu skal siga, at hesin partur av okkara vinnulívið er ein so stórur partur av tí samlaða føroyska búskapinum, at man frá politiskari síðu skal gera nakað við tað ella, man bara skal lata tað fara.

Skal tað fylgjast upp, sum hetta landsstýrið hevur gjørt viðvíkjandi farmaskipaflotanum, so skal tað bara lata fara. Tað vil siga, at so koma vit aftur í tað støðu, at stórur partur av okkara aktivum fer og ein partur av okkara uttanlandsskuld minkar við avskrivingum av tapum frá útlendskum kreditorum. Sølupolitikkurin er nakað, sum løgmaður vanliga ger nokkso nógv burturúr, tað vil siga, sølupolitikkurin av okkara fiskaúrdrátti. Tað hevur undrað meg nokk so nógv, at løgmaður, tá ið talað verður um sølupolitikk, altíð leggur eftir tí núverandi systemi, uttan at hava nakað betrí at seta í staðin. Eitt av teimum stóru problemunum, eitt av teim stóru málunum, sum skulu loysast í framtíðini, tað eru, viðurskifti okkara við EEC. Vit hava í tinginum her ta støðu og hana haldi eg, at vit skulu halda fast við, at vit ikki ynskja føroyskan limaskap av felagsmarknaðinum. Men, síðani 1972 ella 1973 hava vit havt ein handilssáttmála við EEC, sum ongantíð hevur verið broyttur, sum ongantíð hevur verið samráðst um. Eg haldi, at tað er meira at kalla óforsvarligt av samgonguni og av landsstýrinum ikki at hava gjørt nakað við hettar og ikki at hava roynt at komið til samráðingarborið um at samráða seg til aðrar møguleikar, aðrar handilsligar avtalur við EEC og ikki minst nú, ið innanhýsismarkanaðurin í EEC verður til veruleika í 1992. Tað er upp á hægstu tíð, at byrja hesar samráðingar. Í tann mun, eg havi havt møguleikar fyri tí og havt ávísar kontaktir við politikarar í øðrum EEC-londum, so havi eg intrykk av, at londini í dag ikki eru serliga áhugað fyri nýggjum

londum í felagsskapinum fyri-
bils, men at hesi londini fegin
vilja sam- ráðast um aðrar av-
talur við tey uttan fyri stand-
andi londini. Eg haldi, at her
eigur avgjørt at verðið gjørt
nakað við. Nú sýggi eg, at tíð-
in hjá mær er farin, men eg fái
orið aftur og eg skal taka onn-
ur mál til viðgerar tá eg fái
orðið aftur.

Takk fyri.

Formaðurin

Tað er komið eitt skriv til tingið, undirskrivað av Tummas Arabo, tað er soljóðandi:

Eg fari uttanlands í arbeiðsørindum og biði í hesum sambandi um, at næsti maður á listanum hjá Javnaðarflokkinum í Norðstreymoy fyribils tekur sæti á tingi. Eg verið burtur-staddur 7 dagar. Undurskrivað av Tummas Arabo. Næsti maður á listanum hjá Javnaðarflokk-inum í Norðurstreymoy er Kári Petersen, og hann hevur tikið sæti á tingi fyrr í hesum val-skeiðnum, teir tingmenn, sum taka undir við, at Kári Petersen tekur sæti á tingi verða bidnir at reisa seg 20 fyri og ongin ímóti, sostatt er. tað samtykt, at Kári Petersen tekur sæti á tingi.

Jørgen Thomsen (jv.)

Harra formaður.

Lesur tú hesa løgmansrøðu c serstakliga á siðu 3, so er alt, ið bendir á, at stavn-n haldið ikki var av leið, sumð samgongan legði, ta samgongað, var skipað. Uttan iva var ta gott fyri føroyska samfelagi at ein samgonga tók við, einkk, samgonga, sum royndi at gerai-nakað við tann figgjarpolitii-legga ein fastarí figgjarpol tikk, ein sokallaðan konsol deringspolitikk, sum vit nú i heysta fruktirnar av.

Tølini prógva, at titøkineta vóru alneyðug, sum sitandi s gonga kendi seg noydda at sog í verk. Her hugsi eg um tær inntøkulógir, sum vit løgdu tær byrðar, sum vit løgdu á ta-føroyska fólkið. Hetta, sum andstøðan hevur gjørt so ómeð. liga nógv burtur úr líka til dagin í dag og framvegis ger

Tað er soleiðis, at tað íg mong ár hava verið gjørdar rí rættiliga stórar íløgur, ílø ur, sum landskassin hevur vem-nógv veðbundin av eisini og ikki minst undir seinastu sar, gongu, sum sæt undan hesari,- vórðu gjørdar veldugar íløgusar sum landskassin var nógv vegr. bundin av. Spádómarnir um he-íløgur vóru ikki bara bjarta Tað var møguliga onkur grann skoðari, ið hevði góðar

spádómar um hetta. Men spádómar vóru heldur ikki bara bjartir um framtíðina yvirhøvur í hesum samfelagnum. Ein landsstýrismaður steig fram alment og segði fyri Føroya fólki, at føroyska samfelagið alt var í kreppu. Útlitini vóru tí ikki av teimum fagrastu og bjartastu, tá henda samgongan tók við. Umframt hetta er tað hvørjum fólki greitt, at høvðusvinna okkara, er ógvuliga viðbrekin. Minsta broytingin uttaneftir ávirkar alt okkar vinnilívsmynstur ógvuliga skjótt, hvønn veg tað so er.

So, harra formaður. Útlitini vóru ikki av teimum bjartastu, tað varð tí avtrátt, tá ið samgongan varð skipað, at her mátti koma vend í. Vit máttu hava pening til at standa í móti við um ikki alt skuldi enda í fíggjarligum ruguleika, um illa gekst í hond. Og tað er hetta, sum løgmaður vísur á á síðu 3, sum eg nevndi í røðuni, sum formaðurin gevur mær loyvi at lesa eitt brot burtur úr. Samgongan setti sær í 1985 fyri, at reka ein meira avmarkaðan konsuliderandi fíggjarpolitikk, enn verið hevði. Mett var neyðugt at tálma nýtsluni og útvega fíggjarlógunum avlop, so m.a. teir mongu grunnar, sum vóru í afturhond, kundu styrkjast og leggjast kundi upp fyri til útgjalding av nógvum veðhaldsmillión um, sum vóru í vanda. Landskassahallið uppá 60 mió.kr. í 1984/85 minkaði stutta fíggjarárið 1985 til 22 mió.kr. og gjørdist til avlop uppá 257 mió.kr í 1986. Við fyrivarni av, at endaliga skattaavrokningin fyri 1987 ikki fer fram fyrr enn oktober 1988, sýna tølini í dag yvirskot fyri 1987 uppá 290 mió.kr. harumframt, eru 93 mió.kr. lagdar í oljugrunn. Gongdin í toll-og skattainntøkum 1988 benda á, at landskassin kann greiða sínar skyldir hampiliga væl og kortini fáa eitt avlop. Hesin politikkur hevur verið heppin, tí, sum øllum kunnugt, eru hesi árini útgoldnar 100 tals mió.kr. fyri fallin veðhald og vit vita, at eisini 1988 og 1989 gerast stór veðhald effektiv. Játtanirnar til veðhaldsgrunnin vóru sera smáar og eru hesar tí øktar út við 300 mió.kr. eyka. Í alt mugu verða útlagdar yvir 600 mió.kr. seinastu 8 árini har av stórur partur seinastu 2-3 árini,

so eisini her kemur sera væl við, at lagt varð upp fyri, so hetta bleiv goldið.

So, harra formaður.

Tað er alt ið bendur á, at tað var rætt útstigni tá samgongan varð skipað. Hetta er nú vanligt, at løgmaður á ólavsøku heldur røðu og hann greiðir frá tí farna, eins og ætlandi metingar verða gjørdar um framtíðina. Alt, ið sagt verður um framtíðina, kann bert verða met og ætlanir. Hetta fær ikki verið øðrvísi. Framtíðin er og verður eitt óskriva blað. Tað er bert tann, ið øllum valdar, ið sær inn hagar og er altvitandi. Tað er tó sera umráðandi, at sum frægast verður ætlað um, hvussu útlitini eru fyri framman fyri at tey, ið skipa skulu fyri á tí vinnuliga økinum t.d., betur ella frægari kunnu ætla um, hvussu farast skal fram. Og hetta ger seg ikki minst galdandi sjálvandi eisini á øllum øðrum økjum. Fólkið í landinum eigur at fáa at vita, at soleiðis sær myndin út, at soleiðis er støðan í veruleikanum. Tá er greitt at siga frá, at soleiðis sær myndin út í dag, hettar tykir mær gjørt í hesi løgmansrøðu.

Eisini er her at siga, at her er tað serkunnleiki, ið kemur til hjálpar við hagtølum, útrokningum um alt møguligt. Serfrøðingarnir vísa á, at soleiðis var støðan undanfarin ár, og soleiðis er útlitið í ár, soleiðis kann støðan væntast at verða komandi ár, um viðurskiftini verða vanl[illegible] ella so og so. Saman við hesum tilfari, kunnu so politískar ætlanir gerast og metingar.

Farna tíðin lærir okkum og vísir okkum á mangt og hvat. Tað er mangt vit kunnu fegnast um og tað var hóast alt ikki so lítið. Tað var hóast alt nógv, sum eydnaðist, tað var rættiliga nógv, sum hepnaðist, tað var nógv at gleðast um, og verða takksamur fyri. Vóru vit ikki væl spardir, vit føroyingar, eg hugsi jú. Mi[illegible] samstundis, harra formaður, so læra vit av mistøkunum, okkurt var møguliga betri ógjørt, tað var tað, og nógv kundi verið mikið betri gjørt. Men samstundis mugu vit ásanna, at gamla orðatakið, sum sigur, at eftirráðini eru so góð, og tað vænti eg, at vit koma at hoyra rættiliga nógv til undir hesu viðgerðini.

Vit fara at hoyra, nógv um tað farna, -um tað, sum teir ella te[illegible] meta okkum at hava gjørt skeivt, vit fara at hoyra mest um tað, sum ikki eydnaðist, men politikkur má vera annað enn hetta, politikkur má verða at royna at finna út av ella finna møguleikar hvussu vit kunnu koma viðari, royna at gera ætlanir um framtíðina, gera ætlanir um, hvussu vit tryggja

hesum samfelag frægastu kor at liva undir og ikki gloyma, sum onkur hevur sagt her í tinginum, at vit eru vald til, at taka avgerðir og aftanfyri hesar avgerðir eru mannalagnur í næstan hvørjum tíð einasta føri. Tað er tí ikki rætt, at mála alt so ógvuliga ljóst fyri framman ella í øllum førum ikki ljósari enn, tað í veruleikanum er, ella væntast at verða. Men tað er sanniliga ikki skaðiligt, at seta upp ræðumyndir um framtíðina, hvussu hesi bert skaða og gagna ongum og her tikir mær kortini, at hitt seinna er mikið verri, tað er skaðiligt, tað er lívstýnandi at sáða misnøgd, missmót og vantreysti niður í fólkið í landinum, tað er neyvan nakað, ið elvir slíka fólkaspillu, sum júst tað ger.

Javnarðarflokkurin vil tí støðugt føra framtakshugaðan politik, sum setir lívsfrælsið hins einstaka í hásætið. Tað er mangan sagt og tað er eisini sagt í hesi røðu, at vit eiga eitt sterkt og gott samfelag, og tað er uttan iva rætt. Vit eiga eitt gott samfelag, tað mugu vit vera sand um.

Hetta kemur fyrst og fremst av, at her býr framtakshugað fólk í hesum landinum, men næst hesum, haldi eg, at politikkurin, sum førdur hevur verið í hesum samfelag, hevur havt ómetaliga nógva ávirkan á ta gongdina.

Politikarar, løgtingið var fært fyri við lóggávum at skapa fyritreytir soleiðis, at okkara vinnulív kundi útbyggjast bæði til lands og vatns. Tað er, sum tað er sagt, at har, sum eitt sunt vinnulív stimbrast, har útviklast eisini samfelagið í aðrar mátar, í allar mátar, annars ruggar ikki rætt.

Eftir hina sokallaðu slupptíðina, sum eisini var eitt stórt framstig her á landi, vóru føroyingar førir fyri, yvir stutt áramál, stutt tíðarskeið, at fáa til vega ein nýmótans fiskiflota, sum tá kundi fiska nærum óavmarkað bæði nær og fjar.

Tað, ið vert er at býta merki í í tí sambandinum er, at tá settu føroyingar seg í stóra, velduga skuld uttanlands. Hetta mátti so vera, tí tá vóru eingi vinnutól, lítið og einki av skipum, og fiskimenn máttu leita burtur í lond fyri at lívbjarga sær. Men tá stóð uttanlandsskuldin í vinnulívinum, í hesum vinnutólunum og tað er fleiri ferðir víst á, at so leingi, sum lánini verða brúkt til verulig, góð projekt, so er tað jú alt í fínasta lagi.

Við hesum flota vunnu fiskimenn okkara hesum samfelag eitt ríkidømi, sum vit neyvan duga at meta um í dag. Hesir

møguleikar eru so nær um burtur í dag. Nú fáa hesi skip ikki loyvi at veiða har longur og væntandi var, at okkara fiskimenn einans høvdu okkara egnu grunnar at troyta. Men við skilagóðum samráðingum hevur tað eydnast at fáa fiskiveiðusáttmálar við onnur lond og avtalur og nú er tað gleðiliga hent, at nú glottar aftur í Grønlandi.

Samráðingarnar, sum okkara fiskimálaráðharri hevði við grønlandska løgmannin, góvu føroyingum nýggjar vónir um at veiða grønlandstosk aftur, og hetta tykir mær sera, sera spennandi og vónandi verða politikarnir fúsir at hjálpa til fyri at fáa gongd á hesar møguleikar, og at vit ikki tá fara at ganga í ov smáum skóm.

Tí, sum áður sagt, harra formaður, so mistu vit burtur okkara rætt til at veiða, sum vit høvdu framanundan, og tað var tí bráðneyðugt at byggja upp nakað annað, eitt nýtt vinnutól. Nú mátti leggjast um. Tað er hetta, sum eg haldi eydnaðist betur, enn mangur hevði væntað ella hugsað. Tí eg haldi, at vit eru ikki komnir illa burtur úr tí kollveltandi broytingini, sum føroyingar vóru tvungnir inn í og sjálvandi, at í kjalarvørrinum á eini slikari umlegging, sum føroyingar vórðu tvingaðir inn í, mátti koma ein uttanlandsskuld, men sum tí betur ikki veksur so nógv í dag.

Broytingin hevur verið stór. Eg hugdi í bókling at nøkrum veiðutølum, har stóð, at í 1961 fiskaðu vit her á okkara leiðum einans 20.000 tons tilsamans, 10.000 tons av hýsu og 10.000 tons av toski.

Í 1977, tá var sjálvandi sjómarkið útflutt, tá veiddu vit við Føroyar 60.000 tons umframt svartkjaftin, 30.000 tons vóru toskur, 20.000 tons vóru hýsa og restin var so brosma, longa, upsi og annað rud.

Í fjør veiddu vit á føroyaleiðini 175.000 tons, útvið 30.000 tons vóru svartkjaftur og hetta sigur serkunnleikin at vera alt, alt, ov nógv. Tað er tá so hugaligt, at tað glottar aftur aðrastaðir. Tí vit noyðast at satsa, vit føroyingar, upp á aðrar møguleikar, vit noyðast, vit eru tvungnir til tað, um vit skulu lívbjarga okkum í hesum samfelag og tí er tað so gleðiligt, at vit nú frætta um hesar møguleikarnar í Grønlandi.

Á síðu 16 í løgmansrøðuni eru nevnd fleiri sera týðandi mál. Eftir mínum tykki ómetaliga týðandi. Her standa nevnd fleiri arbeiðaramál, sum hava funnið frama hesa setuna, og her er tíbetur rættiliga nógv

komið av skafti.

Arbeiðseftirlitið er útbygt við deildum kring landið. Deildir eru settar á stovn í Norðoyggjum, Suðuroy og Eysturoy og fyrst í komandi ári verður skipað deild í Norðurstreymoy og Vágunum.

Serlækni í arbeiðsmedicini er settur í starv at virka frá 1. juli og 1. september í ár fær Arbeiðseftirlitið ein ergoterapeut, kallast tað, hesin skal leiðbeina og ráðgeva virkjunum, hetta fyri at fólk ikki skulu fáa mein av arbeiðsumstøðunum og hetta sigst at vera ógvuliga átroðkandi.

Í 1986 fingu vit nýggja fritíðarlóg. Fritíðin longd frá 4 upp til 5 vikur og fritíðarprosentið er hækkað frá 9⅓% upp í 12%, sum nokk er tað sama sum 5 vikur við fullari løn.

Fritíðarpeningurin, sum arbeiðarin eigur, verður nú latin løntakarafeløgunum í varðveitslu soleiðis, at hesi nú fáa tann rentuágóðan, sum stendst av at goyma peningin í einum peningastovni. Fyrr fingu tey renturnar, ið goymdu peningin, nevniliga arbeiðsgevarin, so hetta er eitt stórt framstig fyri arbeiðandi fólkið.

Lógin um trygdargrunn veiðumanna, sum bert var fyri veiðumenn er broytt, ætlað soleiðis fyri at galda fólk á landi eisini. Eingin skal verða við sviðið soð, um arbeiðsgevari fer á húsagang. Hetta hevur ikki verið so. Um arbeiðspláss fór av knóranum fyrr, so átti arbeiðari onga trygd fyri sínum peningi, um hann skuldi átt pening hjá einum felag, sum fór á húsagang.

Sum øllum kunnugt, er lógin um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn viðtikin. Lógin fær gildi frá 1. januar 1990.

Jú, sannilíga, harra formaður, vit eru mong, sum eru fegin ja, sera takksom fyri, at tað eydnaðist at gjøgnumføra nøkur týðandi arbeiðaramál í hesum valskeiði, sum nú er komið at enda.

Arbeiðaramál eru soleiðis háttað, at tey møta mótstøðu frá einum parti, og eg vil tí nýta høvi at takka teimum, sum góvu hesum málum sína atkvøðu.

Til seinast vil eg siga, at Javnaðarflokkurin tekur fulla ábyrgd av tí politikki, sum er førdur í hesum samgonguskeiði. Tað verður ongantið komið á mál í politikki, verður sagt, og tað er nokk rætt, men Javnaðarflokkurin er til reiðar at stríðast og verða við til at føra hetta samfelag longur fram á sjálvbjargningsleið, har lívsfrælsið hins einstaka kemur í fremstu rað.

Takk fyri harra formaður.

Pauli Ellefsen (sb.)

Harra formaður.

Tað er, sum tað er sagt, frágreiðing løgmans til Føroya løgting á ólavsøku 1988, sum er til viðgerar. Løgmaður skal her sjálvandi á sakligan og fram um alt á sannan hátt, siga Føroya løgtingi og harvið eisini almenninginum frá um gongdina og støðuna í Føroyum.

Eg ætli mær eisini á ein sakligan hátt at viðgera hesa løgmansrøðu sum eina politiska røðu, sum eina frágreiðing um gongd og støðu í landinum. Eg ætli mær at gera tað í stórum linjum uttan, at fara í smálutir, og eg ætli mær, at halda meg til tað, sum løgmaður hevur sagt og skrivað, og í minst møguligan mun draga annað inn í viðgerðina. Tað, sum er mest spennandi við einari og hvørjari politiskari røðu eins og við røðum av øðrum slagi, tað er samantakið, tann samlaða konklutiónin av øllum teimum setningum og smálutum, sum ein røða upp á meira enn 21 blaðsíður fevnur um. Ein røða uttan samantak, er eingin røða, og ein røða, har samantakið ikki samsvarar við innihaldið í røðuni er verri enn eingin røða. Samantak løgmans stendur niðast á bls. 21. Løgmaður málber seg soleiðis:"Samgongan gongur óskamma fram fyri dóm veljarans í heyst". Hesin fyrsti partur av samantrekki løgmans, samsvarar ivaleyst við sannleikan, tí alt bendir á, at so óskammaðir ella skammleysir kunnu føroyskir politikarar veruliga verða.

Løgmaður heldur fram við at taka saman um, hann sigur: "Vit tóku við búgvi, sum hóast sterkt í grundini, hevði stórar trupulleikar og lata frá okkum búgv, munandi styrkt og konsoliderað".


Í dag veit ikki bert løgmaður, men hvørt einasta mannsbarn í Føroyum, at í hesum seinast endurgivna setningi, sum bert fevnir um tveir pástandir, eru innihildnir heilir tveir ovurstórir ósannleikar. Fyri tað fyrsta er tað ósatt, sum løgmaður pástóð fyri 4 árum síðani og sum hann endurtekur í røðu sini á ólavsøku í ár, at okkara samfelag tá hevði serliga stórar trupulleikar. Hann skal 4 ár longur aftur, nevniliga til 1980 fyri at kunna málbera seg soleiðis. Fyri tað næsta, er tað ósatt, at okkara samfelag hesi farnu 4 árini er styrkt og konsuliderað, hetta hendi í staðin og har um aftur í móti í valskeiðnum 1981 til 1984. Onkur kann kanska halda, at her stendur pástandur í móti pástandi, men hetta er ikki

rætt, ti lesur ein røðu løgmans ígjøgnum, so stendur tað rimmar fast, at hann í gjøgnum alla røðu sínu undirbyggir mín pástand, og samstundis dyggiliga mótprógvar sítt egna samantak. Lesur ein løgmansrøðuna leystliga í gjøgnum fyrstu fer, so sær ein ikki á eitt einasta ítøkiliga fyribrygdi, sum undirbyggir, at samfelagið fyri 4 árum síðani hevði stórar trupuleikar og nú er munandi styrkt og konsoliderað.


Lesur ein løgmansrøðuna eina ferð aftrat, so stendur tað lýsandi klárt, svart uppá hvítt, at løgmaður ikki er førur fyri at káva út yvir, at gongdin hevur verið tann beint mótsatta. Lat okkum byrja við bls. 1, her sigur løgmaður millum annað tær stóru íløgurnar eru høvuðstrupulleikin í føroyskum búskapi í dag. Løgmaður viðgongur skrivliga yvir fyri Føroya løgtingi, at hann og hansara landsstýri ikki hava megnað at stýra okkara samfelag; samstundist váttar hann seinni í røðuni, at undanfarna sambands landsstýrið hevði hesi evnir. Føroyska samfelagið hevði somu trupulleikar í 1980, sum vit hava í dag. Einki politiskt tamarhald á búskaparligu gondini, tað vil siga, undanfarna landsstýrið fekk eftir hálvum øðrum ári tamarhald á hesi gongd, tá pástóðu løgmaður og aðrir, at vit gjørdu tað so effektivt, at vit skaptu arbeiðsloysi í Føroyum í 1982 og 1983, hetta var sjálvandi ikki beint. Vit høvdu har aftur í móti skapt ein avbalanceraðan arbeiðsmarknað í Føroyum, hetta gjørdu vit uttan verkføll og aðrar trupulleikar á hesum øki.

Seinastu 4 árini hava Føroyar har aftur í móti havt heimsmet, tá ræður um verkføll og trupulleikar á arbeiðsmarkaðinum. Tað er tí verri ein sannroynd, at sitandi samgonga, fyri tað fyrsta hevur stílað fyri lántøkum uttanlands uppá út við 2½ milliard krónur, og fyri tað næsta hevur stílað fyri, at fremandir verkamenn og aðrir eru komnir til landið í stórum tali, hava arbeitt fyri dupulta ella tídupulta løn, hava sent peningin nær um óskattaðan av landinum. Alt meðan vit føroyingar sita eftir við lánibyrðuni, hetta er í stórum tann javnaðar- og tjóveldis-politikkur, sum rikin er tey seinast 4 árini í Føroyum.

Á bls. 21 fegnast løgmaður um, at tað var munin hugaligari at virka fyri at loysa trupulleikar av ov nógvum arbeiði, enn at laða upp í lið, sum komin eru í av tí, at einki



RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

LØGTINGS-TIDINDI

1988

Løgtingstíðindi

1988

Løgtingstíðindi

1988

Løgtingsmál



Tórshavn 1995

Løgtingstíðindi 1988
© Føroya Løgting
Fyriskipað av Løgtingsskrivstovuni
Ábyrgd: Kristoffur Thomasson

Løgtingstíðindi

1988

Innihaldsyvirlit

Nr.		Bls.
	Ólavsøkutingsetan 1988	1
	Løgmansrøðan á Ólavsøku 1988	3
	Tingnevndir (3. august 1988)	25
	Vetrartingsetan	275
	Tingnevndir (22. november 1988)	276
	Nýval av formansskapi (18. januar 1989)	277
	Val av løgmanni og landsstýrismonnum	278
	Nýval av nevndum (18. januar 1989)	278
	Tingnevndir (16. februar 1989)	279
	Val av álitismonnum og nevndum (19. apríl 1989)	281
	Nýval av formansskapi (22. juni 1989)	711
	Endurskipan av landsstýrinum (22. juni 1989)	711
	Val av tíggjarnevnd, marknaðarnevnd og fiskivinnunevnd (30. juni 1989)	712
	Farloyvi	770
1	Løgtingslóg um vardar íbúðir	29
2	Løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensionistar	34
3	Broytingar í almannalóggávuni	45
4	Loysn av flogvallarspurninginum í Føroyum	48
5	Krøv til framtíðarflogvøll í Føroyum	51
6	Veiting av ríkisborgararætti	59
7	Lov om bekendtgørelse af love, bekendtgørelse og anordning på Færøerne	61
8	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan	65
9	Afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla	68
10	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt	70
11	Eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnuni	74
12	Tíggjarløgtingslóg 1989	80

13 Løgtingslóg um útbúgvingarstuðul..... 113
14 Broyting í fólkatingsvallóginí..... 127
15 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um ferðagjald..... 132
16 Avmarking av nýtsluni av freon..... 136
17 Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn Íðnaðarins.. 139
18 Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Føroya..... 153
19 Keyp av ognum til landsfyrisitingina..... 155
20 Millumlandasáttmáli viðvíkjandi dálking av havinum... 158
21 Einvís føroysk avmarking í toskaveiðuni í Barents havinum..... 161
22 Býti av raksturaravlopi landskassans fyri fíggjarárið 1987..... 164
23 Metingar í samband við bygging av nýggjum flogvøllí í Føroyum..... 168
24 Løgtingslóg um útbygging av telefonskipanini í Eystur oynni og áseting av tænastustøði hjá TLF mótvegis vinnufyritøkum..... 171
25 Løgtingsmál um fuglaveiðu (62/87)..... 176
26 Ókeypis rætting av tonnum hjá børnum..... 184
27 Uppskot til samtyktar um lækking av skattatrýsti..... 187
28 Uppskot til samtyktar um hækking av persónfrádráttinum..... 190
29 Løgtingslóg um hækking í prísinum á íðnaðarfiski..... 192
30 Avtøka av avgjaldi á blýtríum bensini..... 195
31 Skattalætti fyri inntøkur av útleiging..... 197
32 Skattafrádráttur fyri leiguútreiðslur til býli..... 200
33 Uppskot til samtyktar um hálvt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving..... 203
34 Stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum uttanlands..... 204
35 Rentuágóðin av innistandandi frítíðarpeningi til løntakarar..... 207
36 Uppskot um dagføring av hagtølum..... 208
37 Uppskot til samtyktar um stovnseting av blaðmannaútbúgving í Føroyum..... 209
38 Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti..... 211
39 Stuðul til cyggjaleikirnar í Føroyum..... 216

40 Skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna trúboðarum..... 219
41 Vernd móti uppsøgn orsakað av felagslimaskapi..... 222
42 Demokratirisering av útvarpsmonopolinum..... 225
43 Broyting í útvarpslógini..... 229
44 Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og akamtannarskipanini... 233
45 Løgtingslóg um dupultsporað berghol millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli..... 236
46 Avlamnis-, lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll..... 245
47 Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum..... 251
48 Broyting í vallógini (149/87)..... 257
49 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald..... 258
50 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald..... 263
51 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald..... 267
52 Keyp av skrivstovubygningi til Almannastovuna..... 270
54 Lóg um haruveiðu..... 273
55 Uppskot um trygging av roykfrium umhvørvi á landsstovnum, strandfaraskipum og aðrar staðir..... 274
56 Landsstýrismál..... 289
57 Fyribils fíggjarlóg..... 290
58 Keyp av bygningi til almenna fyrisiting..... 292
59 Gáva til hjálpararbeiði í sambond við jarðskjálvtavanlukkuna í Armenia..... 295
60 Leingihg av ávísum lønarsáttmálum og avtalum v.m..... 296
61 Bann móti handli við Suðurafrika og Namibiu..... 308
62 Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia..... 314
63 Broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu..... 329
64 Fíggjarløgtingslóg 1989..... 332
65 Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1989..... 440
66 Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1989..... 455
67 Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1989..... 463
68 Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir..... 467

69 Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu..... 474
70 Val av nevnd at kanna við tí fyri eyga at veita fíggjarliga hjálp til teirra, ið tingu skaða á hús í óðnarveðrinum hertyri..... 478
71 Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1989..... 481
72 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1989..... 496
73 Keyp av bygningi til Náttúrugripasavnið..... 509
74 Landskassaveðhald fyri lánum frá "Kreditforeningen af kommuner i Danmark" til føroyskar kommunur..... 514
75 Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya..... 517
76 Millumlandasáttmáli um tiltøk móti yvirgangsatgerðum móti skipum v.m..... 520
77 Luttøka Føroya í norðurlendskari avtalu um at veita hjálp tá vanlukkur henda í triðjartíð..... 522
78 Veiting av ríkisborgararætti..... 525
79 Sáttmáli Europaráðsins til vernd móti pínslu v.m..... 527
80 Avtøka av løgtingslóg um avgjald á laksi, veiddum á landleiðini..... 529
81 Skattalætti av útleiging av býli..... 532
82 Val av álitismonnum og nevndum..... 281
83 Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjøld..... 536
84 Nýggj lóggáva um nýggjar reglur um tryggling í Føroyum 539
85 Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands og nýtekning av partapeningi í P/F Flogleiðir 542
86 Um serskatting av hjúnalelaga..... 547
87 Broyting í løgtingslóg um Vaktar- og Bjargingartænastuna..... 549
89 Fyriskipan ímóti dálking av firðum..... 553
90 Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar..... 556
91 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum..... 562
92 Veðhald fyri lánum til Føroya Iðnaðargrunn og Menningargrunnin..... 565
93 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan..... 568
94 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, 571

95 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 573
96 Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum..... 589
97 Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.... 593
98 Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar..... 596
99 Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m..... 599
100 Fyrispurningar..... 761
101 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald av motorakførum v.m..... 621
102 Løgtingslóg um forbod móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni o.ø. líknum leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum..... 624
103 Vegir og lendingar..... 627
104 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald..... 644
105 Broyting í donsku myntlógini..... 648
106 Avtøka av løgtingslóg um avrunding av ávísum oyra upphæddum..... 650
107 Eykastuðul til fiskivinnuna..... 652
108 Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald..... 655
109 Broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald..... 659
110 Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m..... 663
111 Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.. 667
112 Eykaskattur til landskassan..... 671
113 Løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti..... 704
114 Framhaldandi sáttmáli um føroyska fiskiveiðu út fyri stondum hjá USA..... 708
115 Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.. 713
116 Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m..... 717
117 Avtøka av lóg um toll..... 721
118 Avtøka av lóg um toll sjónvarpsmóttakarum..... 723
119 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 725
120 Løgtingslóg um bundna uppsparing..... 730
121 Eykaskattur til landskassan..... 748
122 Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum..... 752

123 Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald..... 755
124 Eykastuðul til fiskivinnuna..... 758
100-1 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi siglingarmøguleikunum í gjøgnum Haraldsund og Hvannasund..... 761
100-2 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonviðurskiftini í Svínoy..... 764
100-3 Fyrispurningur til Karl Hera Joensen, landsstýrismann, viðvíkjandi telefontrupulleikum í Vágum..... 766

EVNISYVIRLIT FYRI 1988

Løgtings-mál nr.		Bls.
	Almannamál	
1.	Løgtingslóg um vardar fbúðir	29
2.	Løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensionistar	34
3.	Lóg um broytingar í almannalóggávuni	45
	Arbeiðsmál	
35.	Rentuágóðin av innistandandi frítíðarpeningi til løntakarar	207
41.	Vernd móti uppsøgn orsakað av fólagslimaskapi	222
60.	Leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum v.m.	296
	Bergholsmál	
45.	Løgtingslóg um dupultsporað bergholi í millum Áninar, Árnafjørð og Depli	236
	Fíggjarmál	
11.	Eykajáttan til grunnar og nevndir viðv. fiskivinnuni	74
12.	Fíggjarløgtingslóg 1989	80
15.	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um ferðagjald	132
22.	Býtið av rakstraravlopi landskassans fyri fíggjarárið 1987	164
30.	Avtøka av blýfríum bensin	195
57.	Fyribils fíggjarlóg	290
64.	Fíggjarløgtingslóg 1989	332

109.	Broyting av løgtingslóg um ferðaavgjald	659
120.	Løgtingslóg um bundna uppsparing	700

Fiskivinnumál

21.	Einvís føroysk avmarking í toskaveiðuni í Barents-havinum	161
29.	Løgtingslóg um hækking av prisum á iðnaðarfiski	192
34.	Stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum uttanlands	204
65.	Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirætt indi í 1989	440
66.	Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1989	455
67.	Regulering av fiskiskapinum á NAFO økinum í 1989	463
71.	Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1989	481
72.	Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiski rættindi í 1989	496
80.	Avtøka av løgtingslóg um avgjald á laksi veiddum á landleiðini	529
107.	Eykastuðul til fiskivinnuna	652
114.	Framhaldandi sáttmáli um føroysku fiskiveiðu út fyri strondum hjá USA	708
124.	Eykastuðul til fiskivinnuna	758

Flogferðslumál

4.	Loysn av flogvallarspurninginum í Føroyum	48

5. Krøv til framtíðarflogvøll í Føroyum 51

23. Metingar í sambandi við byggjan av nýggjum flogvølli í Føroyum 168

Fuglaveiðumál

25. Løgtingsmál um fuglaveiðu (LM62/87) 176

63. Broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu 329

Heilsumál

26. Ókeypis rætting av tonnum hjá børnum 184

Ídnaðarmál

17. Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn Ídnaðarins 139

Landsstýrismál

56. Landsstýrismál 289

Lógarmál

36. Uppskot til dagføring av hagtølum 208

37. Uppskot til samtyktar um stovnseting av blaðmanna-útbúgving í Føroyum 209

44. Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og skamtanarskipanini 233

54. Lóg um haruveiðu (115/87) 273

55. Uppskot um trygging av roykfrium umhvørvi á landsstovnum, strandfaraskipum og aðrar staðir 274

59. Gáva tilhjálpararbeiði í sambandi við jarðsjálvtavanlukkuna á Armenia 295

61. Bann móti handli við Suðurafrika og Namibia 308

62. Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia 314

84. Nýggj lóggáva um nýggjar reglur um tryggjing í Føroyum 539

87. Broyting í løgtingslóg um Vaktar- og Bjargingartænastuna 549

91. Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum 562

96. Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndleikum 589

101. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald av motorakførum v.m. 621

102. Løgtingslóg um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni, o.ø. lidnum leskidrykkum í dósum og eingangsfløskum 624

106. Avtøka av løgtingslóg um avrunding av ávísum oyraupphæddum 650

122. Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndleikum 752

Løgtingsval

48. Broyting í vallógini (149/87) 257

Nevndir

70. Val av nevnd, at kanna við tí fyri eyga at veita fíggjarliga hjálp til teirra, ið tingu skaða á hús í ódnarveðrinum herfyri 478

82. Val av álitismonnum og nevndum 281

Ognarmál

18. Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Føroya 153

19. Keyp av ognum til landsfyrisitingina 155

52. Keyp av skrivstovubygningi til Almannastovuna 270

58. Keyp av bygningi til almenna fyrisiting 292

73. Keyp av bygningi til Náttúrugripasavni 509

Ríkismál

6. Veiting av ríkisborgarrætti 59

7. Lov om bekendtgørelse af love og anordninger på Færøerne 61

14. Broytingar í fólkatingsvallógini 127

76. Millumlandasáttmáli um tiltøk móti yvirgangsatgerðum móti skipum 520

77. Luttøka Føroya í Norðurlendskari avtalu um at veita hjálp tá vanlukkur henda í friðartíð 522

78. Veiting av ríkisborgarrætti 525

79. Sáttmáli Europaráðsins til vernd móti pínslu v.m. 527

105. Broytingar í donsku myntlógini 648

Sjónvarpsmál

47. Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum 251

118. Avtøka av lóg um toll á sjónvarpsmóttakarum 723

Skattamál

8. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan 65

10. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt 70

27. Uppskot til samtyktar um lækking av skattatrýstinum 187

28. Uppskot til samtyktar um hækking av persónstrádráttinum 190

31. Skattalætti fyri inntøkur av útleiging 197

32.	Skattafrádráttur fyri leiguútreiðslur til býli	200
38.	Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti	211
40.	Skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna trúboðarum	219
46.	Avlamis- lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll	245
81.	Skattalætti av útleiging av býlí	532
86.	Um serskatting av hjúnafelaga	547
93.	Broyting í løgtingslóg um avseting av skatti til landskassan	568
94.	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunu skatt	571
95.	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunu-skatt	573
97.	Broyting í løgtingslóg um skattiligar avskriv-ingar	593
98.	Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar	596
112.	Eykaskattur til landskassan	671
119.	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunu-skatt	725
21.	Eykaskattur til landskassan	748

Skúla- og mentanarmál

13.	Løgtingslóg um útbúgvingarstuðul	113
39.	Stuðul til eyggjaleikirnar í Føroyum	216
90.	Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar	556

Telefonmál

24.	Løgtingslóg um útbygging av telefonskipanini í Eysturoynni og áseting av tænastustøði hjá TFL mótvegis vinnufyritøkum	171

Tollmál

49.	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald	258
50.	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald	263
51.	Løgtingslóg um broyting løgtingslóg um eyka innflutningsgjald	267
80.	Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjøld	536
99.	Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.	599
104.	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald	644
108.	Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjøld	655
110.	Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.	663
111.	Broyting í løgtingslóg um serligt influtningsgjald	667
115.	Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald	713
116.	Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.	717
117.	Avtøka av lóg um toll	721
123.	Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald	755

Tænastumenn

9.	Afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla	68

Umhvørvismál

16.	Avmarking í nýtsluni av freon	136

20. Millumlanda sáttmáli viðv. dálking av havinum 158

89. Fyriskipan moti dálking av firðum 553

Útvarpsmál

33. Uppskoti til samtyktar um hálvt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving 203

42. Demokratisering av útvarpsmonopolinum 225

43. Broyting í útvarpslógini 229

75. Happardráttar loyvi til Útvarp Føroya 517

Veðhaldsmál

58. Veðhald fyri lánum til fiskiskap og fiskavirkir 467

59. Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi á goymslu 474

74. Landskassaveðhald fyri lánum frá Kreditforeningen af kommuner i Danmark til føroyskar kommunur 514

85. Veðhald fyri láni til P/f Atlantic Airways, Faroe Islands, og nýtekning av partapeningi í P/f Flogleiðir 542

92. Veðhald fyri lánum til Føroya Ídnaðargrunn og Menningargrunn 565

Vegamál

103. Vegir og lendingar 627

Vinnumál

113. Løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av furunklulosu smittaðum smolti 704

Fyrispurningar:

100-1 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi siglingarmøguleikunum í gjøgnum Haraldssund og Hvannasund 761

100-2 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonviðurskiftini í Svínoy 764

100-3 Fyrispurningur til Kari Hera Joensen, landsstýrismann, viðvíkjandi telefontrupuleikum í Vágum 766

Nr.	Málið	Framlagt Dato	av	1. viðgerð	Nevnd	Álitið	2. viðgerð	3 viðgerð	atkvøðugreiðsla	Avgreitt	Løg nr.
1	Løgtingslóg um vardar íbúðir	18-Aug	FL	31-Aug	Alm. og heilsun.	6/9/88	7/9/88 30-0	7-Sep	27-0	21/10/88	111,3/10-88
2	Løgtingslóg um servitbot til ávísar pensjonistar	31/8/88	FL	2-Sep	Alm. og heilsun.	7-Sep	7-Sep	7-Sep	25 0	20/10/88	110,3/10-88
3	Lóg um broytingar í almannalóggávu	18-Aug	FL	31-Aug	Alm. og heilsun	6-Sep	7-Sep		26-0	28/9/88	
4	Loysn av ílogvallarspurningunum í Føroyum.	2/9/88	P. Michelsen	7-Sep	Samferðslunevnd	6-Sep	6-Sep		2-0	28/9/88	-
5	Krav til framtíðarflogvøll í Føroyum	17/8/	P. Michelsen	2-Sep	Samferðslunevnd	7-Sep	7-Sep		26-0	28/9/88	-
6	Veiting av ríkisborgararætti	18-Aug	FL	31-Aug	Rættarnevnd	6-Sep	6-Sep	-	29-0	28/9/88	-
7	Lov om bekendtgørelse af love, bekendtgørelse og anordninger på Færøerne	31-Aug	FL	2-Sep	Rættarnevnd	6-Sep	6-Sep		br.20-0 úts. 27-0	28-Sep	
8	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan	17-Aug	P. Michelsen	31-Aug	Skattanevnd	7-Sep	7-Sep		29-0	21-Okt	115,3/10-88
9	Afturloka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla	2-Sep	T. Niclasen	2-Sep	-		6-Sep		15 0		
10	Broyting í løgtingslóg um landsskat og kommunuskatt	31-Aug	FL	2-Sep	Skattanevnd	6-Sep	8-Sep	7-Sep	24-0	7-Sep	119,3/10-88
11	Eykajáttan til grunnar og nevndir viðv fiskivinnuni	18-Aug	FL	31-Aug	Figgjarnevnd	7/9/88	7-Sep 31-0	7-Sep	25-0	20/10/88	117,3/10-88
12	Figgjarlegtingslóg		FL	2-Sep	Figgjarnevnd						
13	Løgtingslóg um útbúgvingarstuðul	31-Aug	FL	2-Sep	Ment og Skúlan	6-Sep	6-Sep	6-Sep	24-0	20/10/88	109,15/9-88
14	Broytingar í fólkatingsvállógini	31-Aug	Sjálvst.fl.	2-Sep	Rættarnevnd	6-Sep	6-Sep	-	br. 13-0	29/9/88	-
15	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um lerðsagjald	31-Aug	FL	2-Sep	Figgjarnevnd	5/9-7/9-88	7-Sep 20-0	7-Sep	18-0	20/10/88	118,3/10-88
16	Avmarking í nýtsluni av freon	31-Aug	FL	2-Sep	Umhvørvisnevnd	6/9/88	6-Sep	6/9/88	31-0	6/9/88	126,3/10-88
17	Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn Idnaðarins	31-Aug	FL	2-Sep	Idnaðarnevnd	6/9/88	7-Sep	7/9/88	28-0	21/10/88	120,3/10-88
18	Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Føroya	31-Aug	FL	2-Sep	Figgjarnevnd	6-Sep	7-Sep 23-0	7-Sep	24-0	21/10/88	121,3/10-88
19	Keyp av ognum til landsstýrisstingina	31-Aug	FL	3-Sep	Figgjarnevnd	7/9/88	7-Sep		15-0	29/9/88	

20	Millumlandsáttmáli viðvíkjandi dalking av havinum.	31-Aug	FL	2-Sep	Umhvørvisnevnd	6 Sep	6-Sep		27-0	28/9/88	
21	Eitvis føroysk avmarking í toskaveiðuni í Barentshavinum	31-Aug	FL	2-Sep	Marknaðarnevnd	6-Sep	6-Sep		29-0	28/9/88	
22	Býti av rakstraravlopi landskassans fyri figgjarárið 1987	31-Aug	FL	2-Sep	Figgjarnevnd	7-Sep	7/9/88	7/9/88	17-0	28/9/88	105.8/9-88
23	Metingar í samband við bygging av nýggjum flogvelli í Føroyum	2-Sep	J.I.Olsen og J.M. Olsen	2-Sep	Samferðslunevnd	7-Sep	7-Sep		26-0	28/9/88	
24	Løgtingslóg um útbygging av telefonskipanini í Eysturoynni og áseting av banasluttði hjá TFL mótvegis vinnufyritøkum	2-Sep	J.I.Olsen og J.M.Olsen	2-Sep	Samferðslunevnd						
25	Løgtingsmál um fuglaveiðu (62/87)		Umhvørv.		6/9/88	6-Sep				29/9/88	
26	Ókeypis rætting av tonnum hjá børnum	2-Sep	Ó. Breckm.	3-Sep	Alm. og heilsun.	6-Sep	7-Sep		12-0	29/9/88	
27	Uppskot til samtykt um tækking av skattalýstinum	2-Sep	Ó. Breckm.	2-Sep	Skattanevnd	6-Sep	7-Sep		7-0	29/9/88	
28	Uppskot til samtykt um hækking av persónsfrádráttinum	2-Sep	Ó. Breckm.	2-Sep	Skattanevnd	6-Sep	7-Sep		2-0	29/9/88	
29	Løgtingslóg um hækking í prisum á fiskaáarfiski	2-Sep	Ó. Breckm.	2-Sep	Figgjarnevnd	6-Sep	7-Sep		15-0	29-Sep	
30	Avtøka av avgjaldi á blýfrium bensíni	2-Sep	vegna Ó. Breckm. S.A.Ellelsen								
31	Skattalætti fyri inntøkur av útleigi	2-Sep	Ó. Breckm	2-Sep	Skattanevnd	6/9/88	7-Sep		3-0	29/9/88	
32	Skattafrádráttur fyri leiguútreiðslu til býli	2-Sep	vegna Ó. Breckm. S.A.Ellelsen	2-Sep	Skattanevnd	6-Sep	7-Sep aftur í skattan.		7-0	29/9/88	
33	Uppskot til samtykt um hálvt útvarps-og sjónvarpsgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving	2-Sep	vegna Ó Breckm. S.A.Ellelsen	2-Sep	Alm. og heilsun.						
34	Sluttul til kanningar av nýggjum fiskvinnumøguleikum uttanlands	2-Sep	Ó. Breckm.	2-Sep	riggjarnevnd	6-Sep	7/9/88		7-Jan	29/9/88	

35	Rentuagóðin av innistandandi frítiðarpeningi til løntakarar	2-Sep	Ó. Breckm.								
36	Uppskot um dagliering av hagtalum	2-Sep	Ó.Breckm.	2-Sep			?		15-0	29/9/88	
37	Uppskot til samtyktar um stovnsetan av blaðmannaútbúgving í Føroyum	2-Sep	Ó Breckm	2-Sep	Ment. - og skúlan	6-Sep	6 Sep		8 0 5 0	29/9/88	
38	Sjálvboðin uppsparing við skattafrádráttt	2-Sep	Ó.Breckm.	2-Sep	Skattanevnd	6-Sep	7-Sep		8-0	29/9/88	
39	Stuðul til oyggjaleikmar í Føroyum	2-Sep	Ó.Breckm.	2-Sep	Figgjarnevnd	6-Sep	7-Sep		1-0	29/9/88	
40	Skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna trúboðarum	2-Sep	Ó Breckm.	2-Sep	skattanevnd	6-Sep	7-Sep		2-0	29/9/88	
41	Vernd mót uppsagn orsakað av felagslimaskapi	2-Sep	Ó.Breckm.	2-Sep	Rættarnevnd					31/10/88	
42	Demokratisering av útvarpsmonopolinum	2-Sep	Ó.Breckm.	6-Sep	Ment. og skúlan.	6-Sep	6-Sep		uts. 12-0 §1 13-0		
43	Broyting í útvarpslógini	2-Sep	Ó.Breckm	2-Sep	Figgjarnevnd	6-Sep	7-Sep		uts. 12-0 §1 14 0	28/9/88	
44	Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og skemtiannarskipanini.	2-Sep	Ó.Breckm	2-Sep	Rættarnevnd	6-Sep	6 Sep		13-0	28/9/88	
45	Løgtingslóg um dupultsporað berghol millum Ánimar, Árnafjørð og Depli.	2-Sep	Fólkafl.	2-Sep	Samferðslunevnd	6-Sep	7-Sep		8-0	29/9/88	
46	Avlanis-, lívs- og eftirlønartryggingar- skattafrádrátt fyri øll.	2-Sep	Ó Breckm.	2-Sep	skattanevnd	6-Sep	7-Sep		7-0	29/9/88	
47	Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum.	2-Sep	Ó. Breckm	2-Sep	Ment. og skulan.	6-Sep	6-Sep		§1 11-0	29/9/88	
48	Broyting í vallógini (149/87)				Rættarnevnd	6/9/88	6/9/88		§1 5 0	29/9/88	
49	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald	6-Sep	FL	6-Sep	Skattanevnd	7-Sep	7-Sep	7/9/88	24-0	29/9/88	114,3/10-88
50	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald	6-Sep	FL	6-Sep	Skattanevnd	7-Sep	7-Sep	7/9/88	22-0	20/10/88	113,3/10-88
51	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald	6-Sep	FL	6-Sep	Skattanevnd	7-Sep	7-Sep	7-Sep	24-0	20/10/88	112,3/10-88
52	Keyp av skrivstovubygningi til Almannastovuna.	6-Sep	FL	6 Sep	Figgjarnevnd	7-Sep	7-Sep		15-0	29/9/88	

53												
54	Lóg um haruveiðu (115/87)	6-Sep				6-Sep	7-Sep 30-0		21-0	31/10/88	128,25/10-88	
55	Uppskot um trygging av reykfrium umhvørvi á landsstovnum, strandfaraskipum og aðrar staðir		Alm. og hoilsunevnd	7-Sep			7-Sep		25 0	28-Sep		
56	Landsstýrismál			29-Mar	uttan nevndarvið	29-Mar	31-Mar		20-0	18/4/89		
57	Fyritbils figgjarlóg	15-Des	landsstýr	15-Des			15-Des 29-0	15/12/88	28-0	11/1/89	140,19/12-88	
58	Keyp av bygningi til almenna tyrisit	15-Des	FL	15-Des	Figgjarnevnd	15-Des	15-Des 21-0	15-88	21-0	20/1/89	4,13/1-89	
59	Gáva til hjálpararbeiði í samband við jarðskjálvtavannlukkuna í Armenia	15-Des	J. Sundstein	15-Des			15-Des		28-0	11/1/89		
60	Leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum v.m.	12-Jan	FL	12-Jan	6-mannanevnd	12-Jan	12 Jan	12-Jan	22-0	20/1/89	1 13/1-89	
61	Bann móti handli við Suðurafrika og Namibia.	18-Jan	Javnaðarfl.	10/2/89	Marknaðarnevnd	17/2/89	17/2/89 23/2 útsett		6-0	24/2/89		
62	Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.	6-Feb	FL	10-Feb	Marknaðarnevnd	17/2/89	23/2 útsett	23-Feb	17-0	20/3/89	12,24/2-89	
63	Broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu	10-Feb	FL	17-Feb	Umhvørvisnevnd	23-Feb	23 Feb	23/2/89	25-0	21/3/89	11,24/2-89	
64	Figgjarløgtingslóg 1989			16-Feb	Figgjarnevnd	15-Mar 21/3 2br.tp	21-Mar 32-0	21-Mar	30-0	2/5/89	13,31/3-89	
65	Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1989	16-Feb	FL	23-Feb	Marknaðarnevnd	23 Feb	23-Feb		25-0	24/2/89		
66	Loyvi til fiskiar heimanoyrandi í Týska Demokratiska lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjalt á sjóarki Føroya í 1989.	16-Feb	FL	23-Feb	Marknaðarnevnd	23-Feb	23-Feb		25-0	23/2/89		
67	Regulering av fiskiskapinum á NAFO økinum í 1989.	16-Feb	FL	23 Feb	Marknaðarnevnd	23 Feb	23-Feb		25-0	24/2/89		
68	Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.	16-Feb	FL	23 Feb	Figgjarnevnd	31-Mar	31-Mar		11-17-4	19/4/89		
69	Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m.	16-Feb	FL	23-Feb	Figgjarnevnd	29-Jan	30-Mar 24-0	31/3/89	27-0	3/5/89	27,20/4-89	

70	Val av nevnd at kanna við til fyri eyg at veita fíggjarliga hjálp til teirra, lð fingu skaða á hús í ódnaðarveðrinum herfyri.	16-Feb	Javnaðartl.	8-Mar	Fíggjarnevnd	21-Mar	29-Mar		19-0	18/4/89		
71	Skipan millum Føroyar og Sovjetsam veldlð um sínamillum fiskiraettindi í 1989.	23-Feb	Fl	23-Feb	Marknaðarnevnd	24-Feb	24-Feb		27-0	20/3/89		
72	Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirsettindi í 1989	23-Feb	Fl.	23-Feb	Marknaðarnevnd	24 feb	24/2/89		27-0	20/3/89		
73	Keyp av bygningi til Náttúrugripasav	6-Mar	FL	10-Mar	Fíggjarnevnd	14/3/89	15-Mar 20-0	30-Mar	20-0	3/5/89	30,20/4-89	
74	Landskassastuðul fyri lánum frá "Kreditforeningen af kommunur í Danmark "til føroyskar kommunur,	8-Mar	FL	10-Mar	Fíggjarnevnd	14-Mar	15 Mar 23-0	16/3/89	21-0	1/5/89	22,3/4-89	
75	Happadrátturlpyvi til útvarp Føroya	8-Mar	FL	10-Mar	Fíggjarnevnd	14/3/89	15-Mar 23-0	16-Mar	25 0	1/5/89	23,3/4-89	
76	Millumlandasáttmáli um tiltak móti yvirgangsatgerðum móti skipum v.m	8-Mar	FL	10/3/89	Rættarnevnd	21/3/89	29/3/89		21-0	19/4/89		
77	Luttøka Føroya í norðurlendskari avtalu um at veita hjálp tá vanlukkur henda í friðartíð.	8-Mar	FL	10-Mar	Rættarnevnd	21-Mar	29-Mar		21-0	18/4/89		
78	Veiting av ríkisborgararætti	8-Mar	Fl	10-Mar	Rættarnevnd	21-Mar	29-Mar		21-0	18/4/89		
79	Sáttmáli Europaráðsins til vernd mó pínslu v.m.	8-Mar	Fl	10-Mar	Rættarnevnd	21-Mar	29-Mar		22-0	18/4/89		
80	Avloka av legtingslóg um avgjald á laksi, veiddum á landleiðini,	8-Mar	FL	10-Mar	Fiskivinnunevnd	15-Mar	16-Mar 23-0	21/3/89	24 0	3/5/89	28,20/4-89	
81	Skattalættu av útleiging av býli.	8-Mar	Sambandsfl.	10-Mar	Skattanevnd	16-Mar	21/3/89		7-0	19/4/89		
82	Val av álitsmonnum og nevndum	14-Mar	Útbýtt			19/4/89 vall						
83	Broyting í legtingslóg um eykalan-flutningsgjald.	14/3/89	Sambandsfl. J.J.Olsen	15-Mar	Skattanevnd	16-Mar	21-Mar		7-0	19/4/89		
84	Nýggj loggáva um nýggjar reglur um trygging í Føroyum.	10/3/89	Sambandsfl. S.J.	14/3/89	Rættarnevnd	21/3/89	29/3/89		19-0 5-0	19/4/89		
85	Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways Faroe Islands og nýteknlng av partapeningi í P/F Flogleiðir.	10-Mar	FL	14-Mar	Fíggjarnevnd	31/3/89	31-Mar 24-0	31-Mar	25-0	3-Mei	29,20/4-89	

86	Um serskatting av hjúnafelaga.	10-Mar	Sambandsfl A.Nielsen	14-Mar	Skattanevnd	16-Mar	21-Mar		11-0 13-0	19/4/89		
87	Broyting í løgtingslóg um Vaktar- o. Bjarglngartænastum.	14-Mar	FL	15-Mar	Fiskivinnunevnd	31-Mar	31-Mar 18-0	31/3/89	18-0			
88	Nýggjar fyriskipanir viðv. fiskiveiði á Føroya leiðini.		Sambandsfl. P.E									
89	Fyriskipan móti dálking av firðum.	14-Mar	Sambandsfl S. Jacobsen	15-Mar	Umhvørvisnevnd	29-Mar	30-Mar		24-0	19/4/89		
90	Broyting í løgtingslóg um ávisar skúlar.	29-Mar	FL	30-Mar	Ment. og skúlan.	31-Mar	1/4-5/4 alt. í m.&sk.n.					
91	Broyting í løgtingslóg um skráseting argjald av motorakførum.	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd	29/3-89	30/3/89 23-0	31/3/89	25-0	3/5/89	32,20/4-89	
92	Veðhald fyri lánum til Føroya Idnaðargrunn og Menningargrunn.	21/3/89	FL	29/3/89	Figgjarnevnd	30/3/89	31/3/89 25-0	31/3/89	25-0	3/5/89	26,20/4-89	
93	Broyting í løgtingslóg um avseting á skatti til landsskatti.	29-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd	30-Mar	31-Mar 26-0	31-Mar	24-0	3/5/89	34,20/4-89	
94	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd	30-Mar	31-Mar 27-0	31/3/89	25-0	3/5/89	35,20/4-89	
95	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd	31-Mar	31-Mar 22-0	31/3/89	27-0	3/5/89	33,20/4-89	
96	Broyting í løgtingslóg um evniskrár hjá almennum myndugleikum.	21-Mar	FL	29-Mar	Rættarnevnd	31-Mar	31-Mar 18-Jan	1/4-6/4-89	19-1	20/6/89	45,11/5-89	
97	Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd		31-Mar 26-0	31/3/89	25-0	3/5/89	36,20/4-89	
98	Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.	21 Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd	30-Mar	31-Mar 25-0	31/3/89	24-0	3/5/89	31,20/4-89	
99	Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald v.m.	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd	31-Mar	31 Mar 23-0	31/3/89	24-0 18-0	22/9/89	60,26/5-89	
101	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr 102 frá 1. oktober 1986 um skráseting-gjald av motorakførum v.m.	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd	31-Mar	31-Mar 26-0	31/3/89	26-0	22/9/89	58,20/4-89	
102	Løgtingslóg um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni, o.s. lidnum leskidrykkum í dósum og eingangsílátskum.	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanevnd rætting millum 2. og 3 viðgerð	31-Mar	31-Mar 28-0	31/3/89	28-0	18/8/89	79,27/7-89	

103	Vegir og lendingar.	21-Mar	FL	29-Mar	Samferðslunefnd	29-Mar	30-Mar v/breytingum		22-0	18/4/89		
104	Lagafrumvarp um breyting á lögum nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni breytingum um sérstakt innflutningsgjald.	21-Mar	FL	29-Mar	Skattanefnd	31-Mar	31/3/89 28-0	31-Mar	28-0	22/9/89	59,20/4-89	
105	Breytingar á dönsku myntlögini.	19/4/89	FL	19-Apr			19/4/89		22-0	1/5/89		
106	Ávísana av lagafrumvarp um avrunding av ávísum eyrauppheæddum.	19-Apr	FL	19 Apr			19-Apr	19/4/89	19 0	29/6/89	46,11/5-89	
107	Eykasluðul íp fisklvinnuna	27-Mei	FL	29-Mel	Figgjarnevnd	1-Jun	1/6-22/6 útsett					
108	Breyting á lagafrumvarp um eykaútflutningsgjald.	27-Mei	FL	29-Mel	Figgjarnevnd	1/6/89	1-Jun		14-0 fallið	29/6/89		
109	Breyting á lagatinslóg um ferðaavgjal	27-Mei	FL	29-Mei	Figgjarnevnd	1-Jun	1-Jun		§1 14-0 fall	29/6/89		
110	Breyting á lagafrumvarp um innflutningsgjald v.m.	27-Mei	FL	29-Mei	Figgjarnevnd	1/6/89	1-Jun		§1 fall 16-0	29/6/89		
111	Breyting á lagafrumvarp um sérligt innflutningsgjald.	27-Mei	FL	29-Mei	Figgjarnevnd	1-Jun	1/6-22/6-89 útsett					
112	Eykaskattur til landskassan.	27-Mei	FL	29-Mei	Figgjarnevnd	1-Jun	1 Jun		uts.í 17-0	29/6/89		
113	Lagafrumvarp um stuðul í sambandi við ávtaku av turunkulasusmiltaðum smolti.	27-Mei	FL	29-Mei	Figgjarnevnd	30-Mei	1/6/ tikið av skránni 22/6 útsett					
114	Frambaldandi sáttmáli um føroyska fiskiveiðu út fyri strondum hjá USA.	30-Mei	FL	1-Jun tikið av skr 22/6 útsett 1-Jul nevndarviðg			1-Jul		22-0	6/7/89		
115	Broyting á lagatingslóg um sérligt innflutningsgjald.	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1-Jul	1-Jul 19-0	1/7/89	19-0	18/7/89	65,3/7-89	
116	Broyting á lagatingslóg um innflutningsgjald v.m.	29-Jun	FL	30-Jun	Figgajarnevnd	1-Jul	1/7/89 19-0	1/7/89	19-0	18/7/89	66,3/7-89	
117	Avtaka av lóg um toll.	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1/7/89	1-Jul 19-0	1/7/89	19-0	18/7/89	67/7-89	

118	Avtaka av lóg um toll á sjómvarps-móttakarum,	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1-Jul	1-Jul 19-0	1/7/89	19-0	18/7/89	68,3/7-89	
119	Broyting í løgtingslóg um landsskat og kommunuskatt.	29-Jun	FL	30 Jun	Figgjarnevnd	1-Jul	1-Jul 19-0	1/7/89	19-0	18/7/89	69,3/7-89	
120	Løgtingslóg um bundna uppsparing	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1-Jul br. uppskot T. Niclasen	1-Jul Navnakall 19-0	1/7/89	19-3	18/7/89	70,3/7-89	
121	Eykaskattur til landskassan	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1-Jul	1-Jul 19-0	1/7/89	22-0	18/7/89	71,3/7-89	
122	Broyting í løgtingslóg um evnisskrá-ir hjá almennum myndugleikum.	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1-Jul	1/7/89 19-0	1/7/89	19-0	18/7/89	72,3/7-89	
123	Broyting í løgtingslóg um eykainn-flutningsgjald.	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1-Jul	1-Jul	1-Jul	19-0	18/7/89	73,3/7-89	
124	Eykastuðul til fiskivinnuna.	29-Jun	FL	30-Jun	Figgjarnevnd	1-Jul	1-Jul 19-0	1-Jul	22-0	18/7/89	74,3/7-89	
	FYRISPURNINGAR											
100-1	Lassa Klein viðv. siglingarmøguleikum í Haraldssundi/Hvannasundi					Frá H.O Heinesen o.fl.	fráboðaður 31 aug 1988	atkvøðugreið 2.sept 1988	atkvøður 28-0	svaraður 7.sept.1988	avgreitt 29.sept.1988	
100-2	Lassa Klein viðv. telefonviðurskiftunum í Svínoy					H.O Heinesen Sv.Aa Ellefsen	2.sept 1988	2.sept.1988	19-0	7.sept.1988	29.sept 1988	
100-3	Karl Hara Joensen viðv. telefontrup-leikunum í Vágum					S.Jacobsen	10.mars 1989	14.mars 1989	22-0	30.mars 1989	19 april 1989	

Ólavsøkutingið 1988

Ár 1988, Ólavsøkudag kl. 13.00 varð løgtingið sett. Løgtingsformaðurin frá seinasta tingsetu, Hergeir Nielsen, setti tingið sambært skriv dagfest 11. juli 1988.

Tingmenninir eru:

Norðoya valdømi:

Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Poul J. Olsen, Klaksvík, jf.,
Asbjørn Joensen, Klaksvík, sj.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, tf.

Eysturoyar valdømi:

Olaf Olsen, Glyvrar, ff.,
Jógvan T. Olsen, Toftir, sb.,
Johs. Martin Olsen, Strendur, sb.,
Jørgen Thomsen, Skála, jf.,
Signar Hansen, Fuglafirði, tf.,
Adolf V. Hansen, Toftir, frf.

Norðstreymoyar valdømi:

Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.,
Thomas Arabo, Signabøur, jf.,
Øssur av Steinum, Kollafjørður, tf.

Suðurstreymoyar valdømi:

Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Poul Michelsen, Tórshavn, ff.,
Jógvan Sundstein, Tórshavn, ff.,
Pauli Ellefsen, Hoydølum, sb.,
Eilif Samuelsen, Tórshavn, sb.,
Jóannes Dalsgaard, Tórshavn, jf.,
Jákup Lindenskov, Tórshavn, jf.,
Hilmar Kass, Tórshavn, sj.,
Karin Kjølbro, Argir, tf.,

Hans Jacob Debes, Tórshavn, tf.,
Tordur Niclasen, Eiði, krf. & ftt.

Vága valdømi:
Svend Aage Ellefsen, Sandavági, ff.,
Ivan Johannesen, Miðvági, sb.

Sandoyar valdømi:
Eyðun Videro, Sandi, ff.,
Tórálvur Mohr Olsen, Sandi, jf.

Suðuroyar valdømi:
Flemming Mikkelsen, Vági, sb.,
Sverre Midjord, Tvøroyri, jf.,
Henrik Old, Vági, jf.,
Hergeir Nielsen, Leitið, Akrar, tf.

Fyribils formaðurin bað Sverre Midjord og Flemming Mikkelsen um at virka sum ávikavist 1. og 2. tingskrivari.

Síðani varð nýggjur formansskapur valdur. Til tingformann varð valdur Hergeir Nielsen, 1. næstformaður: Agnar Nielsen, 2. næstformaður: Tórálvur Mohr Olsen og 3. Næstformaður: Jógvan Sundstein.

Sum 1. tingskrivari varð Sverre Midjord valdur og sum 2. tingskrivari varð Flemming Mikkelsen valdur.

Formaðurin gav síðani Alla Dam, løgmanni, orðið til løgmansrøðuna á Ólavsøku 1998.

Frágreiðing frá løgmanni 1988

Eins og undanfarnar, setti sitandi samgonga sær arbeiðssetning við samráðingarnar um skipan av landsstýri, og nú vælskeiðið er nærum runnið, kann ásannast, at sjáldan er so stórur partur av einum samgonguskjali vorðin veruleiki sum hesaferð.

Havandi sera truplu búskaparviðurskiftini, ið valdaðu við ársskiftið 1984/85, í huga, og sera viðbrøknu figgjarviðurskiftini í okkara vinnulívi, er tað merkisvert, at so stórur partur av eini politiskari stevnu kundi innast í verki.

Hinvegin eru eisini týðandi mál, sum ikki eru rokkin, og ímillum hesi einstøk, sum skuldu givið okkum betri møguleika at samskipa alla íløgustýring og forða fyri, at tiltøk, sum eru sett í verk heildini at frama, verða undirgingin av einstaklingum og felagsskapum, sum misnýta skipanirnar og harvið innanhola ikki bert hesar, men allan samfelagsbúskapin.

Sum ofta nevnt er føroyski kapitalmarknaðurin sera opin, og so leingi kreditvirði føroyinga er so stórt, at ikki stendur á at útvega fígging uttanifrá, so leingi er torført at avmarka samlaða íløguvirksemið, serliga so leingi neyðuga samskipanin av virkseminum hjá bankum, figgjarstovnum, privatum, kommunum og landi ikki er undir eftirliti landsbankans.

Hesin er júst farin at virka, og fyribils eru tekin um, at partarnir líta fram til eina samvinnu í samráðingum, og eiga vit at lata hesar standa sína reynd.

At hesar kanska fara at hepnast, eru størri vónir um, nú tærum allir partar eru samdir um, at virksemið er ov stórt, og at tær *ov stóru íløgurnar eru høvuðstrupulleikin í føroyskum búskapi í dag.*

Hesin trupulleikin er kortini ikki størri enn, at ein avmarking við einum 300 miliónum setti okkum í cina javnvágsstøðu.

Ongin orsøk er at dylja, at tær íløgur, ynski er um komandi 5-6 árini, muga og skulu javnast út yvir 8-10 ár, soleiðis sum gongdin í framleiðsluvirðinum hevur verið í 1987 og 1988.

Henda meting kann broytast, um so verður, at væntaða økingin í framleiðsluvirði kortini fer at sýna seg komandi 2-3 árini, og okkurt bendir á, at so verður, men við teim bakkastum, vit hava fingið nú trý ár á rað í framleiðsluvinnuni, har útflutningurin bert veksur einar 50-100 mill. kr. árliga, meðan innflutningurin veksur einar 200 mill. kr. árliga, og íløgulán framvegis liggja óvanliga høgt, er niðurstøðan, at íløgurnar skulu tálmast nakað, og sum eg skal nerta við seinni, eru vit í teirri hepnu støðu, at hetta væl letur seg gera.

Gjaldsjavnahallið í 1988 er framroknað at gerast góðar 700 mill. kr., og kemur uttanlandsskuldin við árslok at liggja um 4600 miliónir. Hon veksur sostatt í fýra ár við 1500 mill. kr., og er hetta meira enn samgongan hevði vónað, men kortini einar 1000-1500 mill. kr. minni enn roknað varð við í 1984.

Vøruinnflutningurin í 1988 er mettur at bliva umleið 3355 mill. kr. — harav skip og flogfør fyri 555 mill. kr., og útflutningurin av vørum verður 2185 , harav skip 175 mill. kr. Hartil koma so útfluttar tænastur fyri 420 mill. kr.

Orsøkirnar, til at útflutningurin ikki veksur meira enn einar 75 miliónir í mun til 1987, eru fleiri og í summum førum nærar enn tær, sum ávirkaðu útflutningin í 1985/86/87. Fiskaloysið eystanfyri og eitt ávist prisfall á saltfiski merkir, at 3000 tons færri eru útflutt og virðið minkað 75 miliónir.

Frystiframleiðslan er í nøgd og virði nærum hin sama sum árið fyri, hóast prisfall nú í nakrar mánaðir.

Ídnaðarfiskur og framleiðslur úr ídnaðarfiski eru vaksin og vaksa munandi út á árið bæði í nøgd og virði. Higartil er nøgdin vaksin so mikið, at samlaða tonsatalið útflutt fyrsta hálvár er 130.000 mótvegis 107.000 fyrra hálvár 1987.

Rækjuútflutningurin er økt um 1800 tonsum og 70 mil. kr. Heri liggur prisvøkstur uppá 5%, og nøgdarvøkstur serliga stavandi frá Kanada-loyvunum.

Hinvegin hevur alivinnuni verið bakkast fyri, og er tí ein væntaður útflutningsvøkstur uppá 300 og 400 mió. kr. skotin fram ávikavist í 1989 og 1990. Orsøkin er furunkolosufellið og annað felli í 1986.

Alivinnan er vinna, har goymsluuppbyggingin er serliga peningakrevjandi. Íntflutt er í 1988 fyri einar 90 mill. kr. í fóðri, og er hesin innflutningur sterkt økjandi, væntuliga við 30-40% árliga.

Hesar goymslur saman við teim sera stóru fiskagoymsium, vit hava í løtuni vegna trekan marknað og lágan prís, benda á, at undir vanligum viðurskiftum og meðal troytan av tilgongiligum kvotum, skuldi útflutningur okkara ligið einar 5-600 milliónir hægri og gjaldsjevnanallið verið burtur.

Um so var, kundu vit endurskoðað iløgurnar og bert avmarkað í mun til tað, ið ovurvirksemið og tørvurin á arbeiðsmegi tiskilar.

Men hóast tað er rættiliga vist, at støðan batnar út á heystið og komandi ár, millum annað tí at proteinframleiðslan í heiminum er minkað, so er nevndi vøkstur enn fugiur á tekjuni, og stendur fyribilsniðurstøðan omanfyri tí við:

Vit skulu og mugu tovggja samtyktu og ynsktu iløgurnar út yvir 8 til 10 ár heldur enn 5 til 6 ár.

Ymiskt úr búskapartølunum

Innflutningshagtølini siga, at framvegis er vøkstur í tilfarsnýtsluni til byggivirksemi, serliga til bygningar heili 20%, meðan onnur framleiðsla liggur í fastari legu.

Maskinur og kapitalútgerð vaksa, tí SEV fær ein stóran motor, men annars minkar hesin innflutningur, sum hevur verið sera stórur.

Bilkeypini tykjast tækka, tí her er minkingin 30%, meðan lastbilar framvegis verða innfluttir í stórum tali.

Vørur til vanliga nýtslu, sum undantarin ár eru vaksnar lítið — sum eisini ætlanin var við nýtsluavmarkandi tiltøkunum í 1986 — vaksa nú aftur við heilum 9%. Tað tykist, sum stóri lønarvøksturin í 1987 og 88 økir rættiliga um nýtsluna aftur.

Hesin lønarvøkstur er samanlagt 17% í mun til sama tíðarskeið í fjør. Partvis er hetta ávirkað av verkfallinum í mei 1987, og helst er eisini talan um ávísa longtíðing. Kortini er tað óvanligt, at samlaða lønútgjaldingin fyrra hálvár er størri enn seinna hálvár árið fyri, tí vanliga økist samlaða útgjaldingin frá fyrru helvt til seinnu helvt av árinum.

Í tekniskum umvælingum og smíði er lítil lønarvøkstur — 3% — meðan bygging, orku- og vatnveiting, flutningur og aling sýna vøkstur 25-30%.

Fiskaritvirkingin, sum hevði afturgongd í 1987, er í lønútgjalding vaksin aftur við 8%'um.

Dýrtíðin — inflatiónin — hevur seinasta árið verið 3-4%, so lønarvøksturin merkir stóra reallønarnækking, men fyrst og fremst stórt virksemi, soleiðis at tann linkingin, vit hildu okkum kenna í 1987, er burturi og virksemið aftur farið at vaksa.

Almenna fíggjarstøðan

Samgongan setti sær í 1985 fyri at reka ein meira avmarkandi og konsoliderandi fíggjarpolitikk, enn verið hevði. Mett varð neyðugt at tálma nýtsluni og útvega fíggjarlógunum avlop, so m.a. teir mongu grunnar, sum vóru í afturhond, kundu styrkjast, og leggjast kundi upp fyri til útgjalding av nógvum veðhaldsmilliónum, sum vóru í vanda.

Landskassahallið uppá 60 mill. kr. í 1984/85 minkaði stutta fíggjarárið 1985 til 22 mill. kr. og gjørdist til avlop uppá 257 mill. kr. í 1986.

Við fyrivarni av, at endaliga skattaavrokningin fyri 1987 ikki fer fram fyrr enn í oktober 1988, sýna tølini í dag yvirskot fyri 1987 uppá 200 mill. kr. Harumframt eru 93 mill. kr. lagdar í oljugrunn.

Gongdin í toll- og skattainntøkum í 1988 bendir á, at landskassin kann greiða sínar skyldur hampiliga væl og kortini fáa eitt avlop.

Hesin politikkur hevur verið heppin, tí øllum kunnugt eru hesi árini útgoldnar hundraðtals milliónir fyri fallin veðhald, og vit vita, at eisini í 1988 og 1989 gerast stór veðhald effektiv..

Játtanirnar til veðhaldsgrunnin vóru sera smáar, og eru hesar tí oktar útvið 300 mill. kr. eyka. Ialt mugu verða útlagdar yvir 600 mill. kr. seinastu átta árini, harav stórur partur seinastu 2-3 árini, so eisini her kemur væl við, at lagt varð upp fyri, so hetta bleiv goldið.

Fiskivinnuni verða roknaðar goðar 100 mill. kr. eyka í hesum fíggjarári. Hetta kemur sjálvandi at ávirka roknskapin fyri 1988, men í hvønn mun vita vit ikki enn.

Sum fleiri ferðir ávist er landskassin sera viðbrekin mótvegis spekulatión í rentuskattaskipanini. Búskaparfrøðingar tala meira og meira um tað órimiliga í, at tað ber til at læna til uppsparing. Tað hevur vundið nógv upp á seg at læna uttanlands til innsetan í føroyskar peningastovnar. Hetta minkat um møguleikan at lætta um hjá teim, ið noydast at læna fyri t.d. at fáa tak yvir høvdið.

Ongin politikkari ynskir at gera tað tyngri at seta búgv. Ongin politikkari ynskir at tyngja um hjá familjum, sum noydast at bera lán. Ongin politikkari ynskir at skerja uppsparing, men vil framvegis stuðla og »premiera« slíka.

Tí er spell, at vit ikki í felag kunnu burturbeina hesa dupultspekulatión og varðveita fyrimunirnar.

Vónandi kann komandi løgting typpa betta rentuhol, sum nú fleiri og fleiri smoykja seg ígjøgnum fyri at skulka undan samfelagsskyldum. Skyldum, sum onnur mugu rinda í skatti og tolli.

Avmarkingar — Raðfestingar

Sum eg nevndi, kann ein minking í samlaða íløguvirkseminum uppá einar 300 milliónir veita okkum betri húskaparjavnvág.

Vit eru í teirri heppnu støðu enn, at hóast beinleiðis nýtslan er vaksin nakað, so er hesin vekstur munandi minni enn í grannalondum okkara, og íløguparturin av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni er so nógv størri hjá okkum. Vit kunnu tí minka henda part uttan, at tað, sum í grannalondunum, fær arbeiðsloysi sum avleiðing.

Men í hesi raðfesting — prioritering — fyri komandi 8-10 árini, er neyðugt at hava vinnulívsíløgurnar fremri enn aðrar, so neyðug útskifting av vinnutólum kann fremjast, og ávisum samskiftisíløgum sleppst heldur ikki undan, tí hesar vaksa um landið, varðveita búsetingarmøguleikar og eru fortreyt fyri vinnuvirksemi. Tað er sum so ofta sagt framleiðsla saman við ávisum afturhaldi, sum kann loysa okkum úr fíggjarligum høftum.

Talað verður nógv um ov stórar skipaíløgur, og hava hesar verið stórar, men við tí politikki, nú er lagdur, fara tær at minka. Skip mugu út, koma skip inn, og á Føroya-leiðunum kann hetta einans lata seg gera, verður samstundis framdur niðurskurður í veiðiorku.

Minkaði stuðulin til skipabygging og veruleikin, at framyvir verða einans 5% latin í veðhaldi saman við útvegaðum siðustilaðum bankaveðhaldi uppá 5%, vil væntuliga geva okkum frægastu projektini, sum so aftur skulu metast nágreiniliga av sáttmálastovninum.

Krøvini, til hvat roknast kann sum eginpeningur, ið eginpeningsnevndin setti fyrra árið, vilja eisini ávirka sítt, so samanumtikið er samtykt munandi afturhald á hesum øki.

Fiskiskip eru tó lívsgrundarlagið, og mugu vit ansa eftir ikki at skerja íløguhugin so nógv, at ikki nýroyndir verða framdar. Tær eiga lívið í okkum, eisini tær vágiligu og lutvist mishepnaðu.

Havnaætlanin er 8-ára ætlan, og má so ansast eftir, at byggingarnar ikki verða framdar skjótari.

Sjúkrahúsbyggingin er ætlað framd yvir 7 ár, og skúlabyggingin eitt líknandi áramál.

Tað verða so aðrar almennar kommunalar og privatar útbyggingar, sum eisini mugu toyggjast. Vónandi kunnu peningastovnarnir medvirka til at avirka hetta yvir lánveitingarnar.

Fiskivinna — Veiðumøguleikar

Við árslok 1987 vóru vit rættiliga bjartskygd um góða Noregs/Sovjetsáttmálan, tí kvoturnar vóru nógv vaksnar og stovnsmetingarnar góðar.

Væntaðu tí eisini, at feskfiskaflotin fekk burturúr hesi øking, og veiddu feskfiskatrolararnir eisini fyrst í árinum útvið 3000 tons eystanfyri. Fiskiskapurin minkaði tó burtur í einki, og er hetta eitt álvarsligt afturstig fyri saltfiska/flakatrolararnar.

Á Flemish Cap er ongin veiða í ár, og hava saltfiskaíløguskipini tí stórar trupulleikar. Eisini frystilinubátarnir hava drigið ov lítið fyrra hálvár, men nú svartkalvatíðin er byrjað, sær frægari út.

Laksaveiðan innan 200 fjórðinga markið sveik heilt, og hesi skip leita nú eftir øðrum møguleikum. Talað verður um at royna eftir turrfiski og øðrum virðismiklum fiski á viðum havi. Landsstýrið stuðlar slíkari roynd.

Føroyaleiðirnar hava sum nevnt roynst eins úrúgvar og seinasta ár, og nóta- og ídnaðarflotin átti við verandi prisum at fingið eitt hampiligt ár.

Men í svartkjaftavinnuni, sum vit høvdu góðar vónir um á ólavsøku í fjør í samband við, at skræðuleyst beinfrítt flak kundi framleiðast og seljast fyri góðan pris, eru vónirnar fjaraðar munandi, og tungt tykist verða at koma viðari, nú tvey skip eru løgd vegna figgjartrupulleikar.

Rakstrartølini fyri 1987 sýna fyri flestu skipabólkar frægari úrslit enn árini fyri og hetta hóast lakari veiðu á Føroyaleiðunum, og tær umsóknir um serlán, ið innkomnar eru, prógva eisini, at ikki stendur so illa til í vinnuni, sum summir prestar prædika.

Tað eru politikkarar og bløð, sum hava tikið sær rættin til at áseta — ella definera — at fiskivinnan er — Føroyar eru — í eini djúptgangandi kreppu, ja djypri enn nakrantið fyrr.

Henda rættin eiga teir ikki og fáa hann heldur ikki, og hartil er slík tala heilt burturvið.

Eins burturvið sum trúttanin um, at ávísir samgonguflokkar ganga við duldum ætlanum um at sosialiscra allan veiðuflotan, oll framleiðsluvirkini og alla fiskasølu, bert soleiðis fyri »sportsins skuld« — sum tikið verður til.

So grunnum politiskum tjaki ber ikki til at luttaka í.

Vit áseta onga kreppu og viðganga heldur ikki, at ynski er um at jarðleggja vinnulívið, svølta fiskiflotan ella skapa húsagang.

Men vit dylja heldur ongar trupulleikar, dylja ikki tey tiltøk, eitt ábyrgdarstýri noydist at seta í verk.

Tær skipanir, samtyktar eru fyri at minka um veiðutrýstið á Føroyateiðunum, mugu t. d. fremjast, hóast tað kenst sárt hjá onkrum.her er hugsað um økta meskavídd, størri minsta mark, ásett fiskidagatal, avmarkað loyvi til Føroyaøkið o. s. fr.

Neyðugar nýskipanir

Tað skerst ikki burtur, at okkara sølulið hevur avgerandi ávirkan á framleiðsluval og marknaðarval, og harvið aftur á hvørjit fiskasløg høvuðsdenturin verður lagdur á.

Denturin hevur verið lagdur á at selja ráevrur til iðnaðin hjá øðrum, heldur enn meira viðgjørda og góðskaða vøru. Hetta er kanska skiljandi, tí tungt er at bróta upp úr nýggjum og tungt at koma inn á vardar marknaðir, men valið kemur okkum aftur um brekku, tí nú mugu vit igjøgnum eina tunga uniskipan.

Tað stendur í dag greitt, at tilkavinna, rikin so sum verið hevur, ongi lívilikindi eigur. Hon hevur kunnað verið hildin uppi við støðugt økjandi stuðulsveitingum og umfordeilingum, men einaferð steðgar hetta, tí onga staðni slepst eftir meir studningi.

Vit mugu aftur í eina støðu, har tað, sum krevst til rentung og og avdrátt av vinnutólum umframt lønir og kapitaltilvøkstur, fæst inn uttanífrá.

Tí er ein politikkur, har allir partar í meira mun enn nú, hvar veiðuliðið er «harmonika» í skipanini, merkja hvønn veg tað ber, so allir partar kunnu leggja seg í sela til tess at broyta gongdina.

Avmarkingarnar noyða okkum at veiða nærum øll fiskasløg, eisini tey biligaru. Samfelagið hevur tí rindað fyri at steingja partar av flotanum burturi frá virðismiklari fiskasløgum, men eisini tey má virkast fyri at fáa meira fyri uttanlands. Tá tað t. d. ber til hjá Íslendingum at fáa so munandi meira fyri kongafisk, enn vit fáa, so má broyting henda.

Nevndi, at tungt hevur verið at fingið svartkjaftavinnuna at mala, men kortini hava vit ikki ráð at sleppa endanum, hetta okkara største tilfeingi skal fáast at geva lønandi vinnu.

Tað almenna hevur skyldu til at stuðla dyggiliga aftur, ikki fyri at statsstyra eini vinnu, sum onkur vil vera við, men tí so nógvir privatir eru útbløddir í hesi vinnu, sum hevur verið kanska hin liberalasta av øllum, tí so lítið hevur verið latið í studningi.

Tá skipini skuldu útvegast, vóru nógvir privatir um boðið, og teir, sum sluppu at fremja íløgur, kendu seg hepnar, men í dag er eins og áramóðið er linkað, máturin og peningaorkan ganga undan.

Tað eru ávísir veruleikar, sum siga okkum, at ikki ber til at sleppa endanum.

1. Vit koma at innflyta fyri hundraðir av milliónum í alifóðri komandi árini. Hetta kunnu vit eins væl framleiða sjálvi, megna vit at fáa til lands tey 15-25.000 tonsini av svartkjafti, sum hvørt skipið higartil hevur pumpað yvirborð aftur.

   Hertil krevjast serligar niðurkøliagar- og goymsluskipanir.
2. Protein framleiðslan í heiminum er minkað.
3. Ætlanir um aling í fjareystri, Afrika, ja um allan heim eru so stórar, at ongantið kann útvegast nóg mikið av fiski til fóður, og hann skal nú nýtast, tí hann hevur tey protein, feittsýrur og aminoevni, sum krevjast til gott fóður.
4. Framleiðslutøkni, sum vinnur á sandmaðka-trupulleikunum, finnst og kann útviklast t. d. «granulat frysting» og «extrudering» til lidnar vørur.

Men royndir og útvegan av kunnleika til framleiðslustýring kosta nógvin av peningi, eins og tað kostar at gera seg meira óheftan á marknaðunum.

Eitt, sum dentur tí má leggjast á í raðfestingini av útbyggingini av okkara útbúgvingunum, er at laga skúla- og útbúgvingarskipanina so, at vit gerast kunnug við nýtslu av hátøknifrøði, so sum so mong onnur róvøruflátsk lond hava verið noydd at gera, t.d. Japan, Danmørk og Svøriki.

Skulu vit lættari sleppa fram at marknaðum fyri viðgjørdum vørum, er ein avtala við felagsmarknaðin um teirra »innara« marknað lívsneyðug.

Hon kann eftir landsstýrisins tykki ikki merkja limaskap, men kemur helst at krevja ávísar »harmoniseringar« — innan tolløki og burturbeining av verjutolli.

Tað er m.a. við hesum í huga, at landsstýrið hevur skipað serliga tollumsitirg.

Innflutningsgjaldskipan okkara kemur helst eisini í vanda, tí øll onnur lond hava merivirðisgjaldskipan. Tí er møguligt, at eitt nýtt føgting fær slíka at taka stoðu til.

Nú okkara samfelag í stóran mun broytist soleiðis, at størri partur av samfelagsorkuni verður nýttur í »sekundér«-virnuni, vildi ein »momsskipan« kanska bóska betri enn verandi »omsskipan«, tí hon rakar ikki útflutningsvinnuna og tekur mest frá teim, sum brúka mest. Eisini slíkum, sum kunnu brúka, tí tey hava skákað sær undan skatti ella øðrum skyldum.

Íðnaðarmál

Føroyskur iðnaður, handverk og tænastuvirksemi standa meira enn nakrantíð við eitt vegamót. Útlendska kappingin er hørð og tykist harðna.

Stór kapping er um arbeiðsmegina. Alt ov ofta fara tleiri undir somu framleiðslu, við tí úrsliti at trupult er hjá nøkrum at klára seg. Ofta verður ov lítið hugsað um sølu og marknaðarkanningar, áðrenn tarið verður undir framleiðsiu, og tað má tíverri sannast, at eginpeningurin ofta er í minna lagi.

Spekulatiónsstíðirnar fara at hasa av, men føroyskur iðnaður, handverk og tænastuvirksemi mugu rokna við, at tey leingi koma at kenna avleiðingarnar av eini tíð við dýrum grundøkjum, høgum stovningarútreiðslum, dýrum og ótryggum tænastuveitingum, einum sum heild avskeplaðum lønarlagi og tvørrandi arbeiðsmegi. Tað kann vera ringt hjá føroyskum iðnaði, handverki og tænastuvirksemi at tóta sær í hesi støðu, men hetta er og verður neyðugt.

Skal virkjunum verða lív lagað, og skulu tey hava framgongd, so verður neyðugt hjá teimum at bøta munandi um arbeiðsumstøðurnar, soleiðis at talið á arbeiðsfólki verður minst møgulit, og at tey starvandi fáa góðar, tryggar og áhugaverdar arbeiðsumstøður, har teimum verður sýnt álit sum meiávirkandi samstarvsfelagar. Virkini mugu rationalisera, effektivisera og í størst møguligan mun leggja seg eftir dygd og kunnleika í øllum liðum. Kapping kann vera góð, tí hon eggjar virkjunum til at mennast og eggjar teimum starvandi til nýhugsan.

Landsstýrið heldur tó, at tað í dag er stórur tørvur á samstarvi millum føroysk virkir, so at tey kunnu ognа sær serkunnleika hvørt á sínum øki og harvið gerast kappingarfør, heldur enn at fevna um alt, t.v.s. alt tað sama sum hini virkini. Tá kenna vit úrslitið frammanundan.

Tað almenna stuðlar iðnaði, handverki og tænastuvirksemi á so mongum økjum og á mangan hátt. Menningargrunnur Iðnaðarins, sum varð settur á stovn í 1973, hevur til 1988 fingið játtað 112,5 mill. kr. á fíggjarlógini. Við støði í hesum og landsstýrisins veðhaldum hevði Menningargrunnurin við árslok 1987 effektiv lán uppá umleið

232,5 mió. kr. Herumframt veðhelt grunnurin fyri umleið 32,5 mió. kr., og ár um ár hevur grunnurin veitt iløgustuðul og stuðul til gransking, vørumenning, kanningar, útbúgving og sølufremjandi tiltøk.

Meðan Menningargrunnur Ídnaðarins er tørur fyri at veita lán við eini rimiligari rentu, so hevur Føroya Ídnaðargrunnur ikki sama møguleika. Landsstýrið umhugsar at bøta um møguleikarnar hjá hesum grunni. Í 1970 fekk hann eitt stovnsfæ uppá 4,5 mió. kr. Við árslok 1987 hevði grunnurin effektiv lán hjá idnaði og handverki uppá umleið 185 mió. kr.

Til tess at ráðgeva landsstýrinum, almennu grunnunum, fyritøkum og einstaklingum, sum reka vinnufyritøkur ella hava áhuga fyri at fara undir slíkan rakstur, hevur Menningarstova Landsins virkað í nærum eitt ár. Enn er stovnurin lítil, men kortini hevur hann megnað at gjørt vart við seg, tá ið talan er um vørumenning, sølufremjandi arbeiði, skeiðvirksemi og ymiska ráðgeving.

Í samstarvi við ídnaðarfelagið, handverkara- og meistarafelagið, grunnarnar og aðrar stovnar fer Menningarstovan í næstum undir neyva virkis- og vøruskráseting. Ein slík skráseting vil mest av øllum tæna virkjunum og lángevarunum, men hon vil eisini sýna, um virkisøki eru, sum krevja serligan menningarstuðul.

Umframt frammanfyrinevndu grunnar og stovnar hevur landsstýrið eisini veitt lán og studning úr grunninum til ídnaðarfremjandi endamál, sum í serligan mun hevur stuðlað útjaðaravirkjum. Í sambandi við almennan partapening í virkir, har serligur tørvur er á arbeiðsskapandi tiltøkum, umhugsar landsstýrið at biðja tingið um at samtykkja eina heimildarlóg, soleiðis at landsstýrið saman við løgtingsins fíggjarnevnd kann seta upp til 20% av partapeninginum í slík virkir.

Fjarskotnum oyggjum og bygdum tørvar serligan menningarstuðul. Landsstýrið hevur umhugsað, á hvønn hátt Menningargrunnur Ídnaðarins kann veita slíkan stuðul.

Í sambandi við ymiskar javnføringar í lógini og reglugerðini fyri Menningargrunnir fer landsstýrið at leggja uppskot fyri tingið í hesi tingsetuni. Hesar broytingar umfata eisini serligar reglur fyri útjaðaraøkini.

Landbúnaður

Seinastu 10 árini er mjólkarframleiðslan vaksin við sløkum 4 mió. litrum til 5,8 mió. litrar í 1988, og eru tað gott 100 húski, ið kunnu hava sína ársinntøku í mjólkarframleiðslum.

Í 1987 vóru 5.483.877 litrar innvigaðir til mjólkarvirkini. Hetta er ein vøkstur uppá 13,7% frá árinum fyri.

Orsakað av hesum vøkstri var meirinýtslan umleið kr. 210.000,-.

Í 1988 tykist vøksturin ikki at fara at vera ovurhonds stórur. Teir fyrstu 5 mánaðirnar í 1988 er um 1,3% meira mjólk komin til mjólkarvirkini enn fyri sama tíðarskeiðið í 1987. Av tí at vøksturin er størri í mai mánaða enn undanfarnu 4 mánaðirnar, er rímiligt at meta vøksturin fyri árið 1988 til 3% og tað sama fyri árið 1989. Samsvarandi verður framleiðslan fyri 1989 mett til 5.8 mió. litrar.

Í 1987 varð studningur latin til umleið 11.663 litrar, sum vóru seldir privat.

Studningur varð í 1987 latin til 103.000 kilo av neytakjøti, harav umt. 13.000 kilo vóru úr bygdum, sum fáa hægra studningin.

Studningur varð latin til 58.300 kilo av grísakjøti í 1987, sum er munandi meira, enn mett var. Grísagarðurin í Froðba metir framleiðsluna í 1988 til 65.000 kilo og til 70.000 kilo í 1989.

Studningur varð í 1987 latin til 2.187.000 egg.

Økt framleiðsla skuldi minkað um studningstørvin, so spurningurin er, um hesin ikki

eigur at verða læstur fastur, so hann verður javnaður út á størra talið av eindum, tað verði seg kg, litrar ella stykkjatal.

Í 1987 vóru 274.000 m² veltir úr nýggjum, 94.000 m² umvæltir og 2164 m av traktorvegnum gjørdir.

Traktorvegir inni á nýdyrkaðum lendi hava vist seg at vera neyðugir fyri at fáa grøðina forsvarliga til høldar, og kann ti roknast við vaksandi iløgum til hetta endamál.

Studningsupphæddin hevur ikki verið regulerað í fleiri ár, og er nú oftast niðanfyri 50% av vanliga kostnaðinum, tá hægst: studningur — kr. 3,50/m² verður latin.

Avloysingarskipanin hevur virkað í tvey ár, og útvegar Royndarstøðin enn bert í ávisan mun hesa avloysing, soleiðis at bóndin til sjálvur hevur roynt at fingið sær avloysing.

Til hetta endamál hava mjólkarframleiðarar samtykt at lata eina ávisa upphædd í ein avloysingargrunn.

Á lógarøkinum kann verða nevnt, at nýggj jarðarlóggáva er lýst. Henda lógin avloysir partar av lóg »for Færøerne om Jordbrugets Fremme«, frá 1937.

Henda nýggja jarðarlógin áleggur framleiðsluskyldu og ger tað møgutigt at fáa annan festara istaðin, um hon ikki verður hildin. Við hesum skuldu møguleikarnir hjá fyrisitingini at fáa festarar við yrkisligum forrreyttum og hegni at røkja jarðarbrúk verið munandi betri enn eftir gomlu lógini.

Alivinnan

Seinastu 10 árini hevur alivinnan verið í støðugum vøkstri. Í dag hava vit 21 smoltstøðir og 55 alistøðir á sjónum. Í ár er smoltframleiðslan 4,5 mió., og nøktar hetta torvin í løtuni. Fýra smoltstøðir, sum hava fingið loyvi, eru enn ikki farnar undir framleiðslu. Tá hesar koma við — væntandi so, at tær koma at lata smolt næsta ár — verður framleiðslan 5,5 smolt.

Í 1987 var samlaði útflutningurin 3830 tons. Her er tann laksur, sum verður veiddur á viðum havi, taldur við í hagtølunum. Meringarnar fyri 1988 sýna, at útflutningurin verður 3220 ella 610 tons minni. Orsøkin er felli, serliga furunkolosufeliið í juni 1986.

Landsstýrið hevur nú givið 14 nýggj loyvi til sjógvaling. Koma hesar í gongd, og fáa vit tamarhald á sjúkunum, verður framleiðslan 10.000 tons í 1989 og 12.000 tons í 1990. Við eini varisligari meting (50,- kr./kg) skuldi hetta givið eitt útflutningsvirði uppá ávikavist 500 og 700 mió. kr. nevndu ár.

Ein partur av teimum nýggju sjógvaliloyvunum eru givin á økum, har vit fyrr høvdu ta fatan, at aling ikki kundi fara fram, orsakað av aldu. Talan er sostatt um áhugaverdar royndir — royndir, ið kunnu ávísa enn størri møguleikar fyri aling á sjónum. Slíkar støðir hava størri framleiðsluorku, eru minni viðbreknar mótvegis sjúku og lætta um innivist á firðum.

Alivinnan hevur havt og hevur framvegis ávísar figgjarligar trupulleikar at dragast við. Orsøkirnar hava verið fleiri. Árini frammanundan var ov lítið smolt til taks. Prísstigan á heimsmarknaðinum helt sær ikki á tí høga støði, hon var á tey fyrru árini. Trupulleikin við sjúkum gjørdist eisini størri enn væntað varð.

Nú er nóg mikið av smolti til taks. Fyri at bøta um figgjarstøðuna hjá alivinnuni annars, er tað ætlan landsstýrisins at broyta áramálið í ollum loyvum. Tá talan er um sjógvalistøðir, umhugsar landsstýrið at broyta áramálið úr 7 upp í 10 ár. Viðvikjandi føstum alibrúkum og smoltstøðumm verður umhugsað at broyta áramálið úr 7 upp í 12 ár. Landsstýrið roknar so við, at lánistovnarnir fara at leingja avdráttartiðina í sama mun. Fiskasjúkulæknatænastan er av alstórum týdningi fyri vinnuna. Higartil eru tveir fiskasjúkudjóralæknar settir. Ætlanin er at útbyggja hesa tænastu.

Samtykt er at útbyggja støðina hjá P/F Fiskaaling við Áir. Útbyggingin kemur at kosta umleið hálvthundarð milliónir krónur, og verður henda framd yvir eitt fýra-seks ára skeið. Ætlanin við hesi útbygging er ikki, at støðin skal økja munandi um framleiðsluna av smolti og matfiski. Høvuðsendamálið er at bøta um umstøðurnar á støðini, soleiðis at hon í nógv størri mun kann skipa fyri royndum, fremja gransking og standa fyri praktiskari útbúgving og eftirútbúgving av fólki, sum starvast í vinnuni.

Týdningarmesta orsøkin er tó, at samstarvið, sum vit føroyingar hava havt við Noreg um kynsbótaarbeiði, av ymiskum orsøkum má broytast, soleiðis at vit sjálvir taka ábyrgdina av at útvega lívfisk á hægsta støði til ta skjótt vaksandi føroysku alivinnuna. Undir verandi umstøðum er støðin hjá P/F Fiskaaling ikki útgjørd til hetta arbeiði.

Eftir tilmæli frá sakkunnleikanum er landsstýrið komið til ta niðurstøðu, at økið norðuri við Áir ikki er væl hóskandi til útseting á havbit. Hinvegin verður Fámjin hildið at vera sera væl hóskandi. Í ár eru 45.000 laksasmolt sett út í Fámjin.

Um henda royndin gevur eitt nøktandi úrslit, heldur landsstýrið, at vit í framtíðini eiga at seta eitt munandi størri tal av laksasmolti á havbit. Kanningar í Íslandi sýna, at teir árið eftir útsetingina fáa 5% av laksinum aftur. Ein størri útseting er eisini við til at grundgeva okkara havfiskiskap eftir laksi.

Landsstýrið heldur, at allar royndir innan aling og havbit skulu fyriskipast av Fiskirannsóknarstovuni og P/F Fiskaaling.

Sjóvinnumál

Landsstýrið hevur ynskt at seta fulltrúa í landsumsitingina at taka sær av sjóvinnumálum burturav.

Síðani tá hava vit fingið nýggja lóg um manning av skipum, nýggja sjómansløgtingslóg, lóg um sjóvinnu og nýggja lóg um mynstring av skipum.

Við undantak av ti seinastu, so skal landsstýrið í kunngerð boða frá, nær hesar lógir koma í gildi. Hetta hendir væntandi áðrenn árslok í ár. Eftir hesum lógum skulu vit hava eitt sjóvinnuráð, eina sjóvinnuumsiting og ein sjóvinnustjóra.

Landsstýrið hevur tó samtykt at fremja uppbyggingina av hesi umsiting yvir eitt áramál. Í fyrstu atløgu hevur landsstýrið samtykt at seta ein ráðgeva í sjóvinnumálum. Hesin tekur við fyrst í september 1988. Eftir hetta verður sjóvinnuráðið valt. Síðani verða umrøddu lógir settar í gildi.

Tá hetta er gjørt, kunnu vit boða frá til IMO, at Føroyar hava ratifiserað STCW-sáttmálan. Síðan skulu fleiri kunngerðir setast í gildi við heimild í nevndu lógum.

Ein stórur partur av farmaskipaflotanum kom í álvarsligar trupulleikar. Talan var um tann nýggjasta partin av flotanum. Hesin parturin av flotanum hevði ongan møguleika. Byggikostnaðurin var alt ov høgur. Rakstrarútreiðslurnar alt ov stórar og flutningsinntøkurnar alt ov lágar í mun til íløgurnar og rakstrarútreiðslurnar.

Skattamál

Tá henda samgonga varð skipað, vóru størri broytingar í skattalógunum og ein útbygging av skattaumsitingini nøkur av høvuðsmálum landsstýrisins.

Hesi mál eru í høvuðsheitum nádd í dag.

— — —

Í Føroyum hevdu vit onga lóggávu fyri skatting av kapitalvinningi, so sum grannalond okkara hevdu. Vinningur við sølu av fastari ogn og skipum var skattafriur.

Hetta merkti, at persónar og felǿg kundu vinna milliónaupphæddir, ja í mongum førum tíggjutals milliónaupphæddir skattafrítt við sølu av skipum ella fastari ogn.

Henda vantandi lóggáva var helst eisini ein av høvuðsorsøkunum til tær mongu sølurnar av gomlum skipum til uppskrúvað virði, og standa keypararnir av hesum skipum í dag við einari alt ov stórari afturgjaldingarskyldu, og kann hetta ti eisini sigast at vera ein av orsøkunum til trongstøðuna, partur av fiskiflota okkara er í dag.

Eftir nýggju lógini verður kapitalvinningur skattaður sum vanlig inntøka.

— — —

Til tess at minka um privatnýtsluna framyvir og hjálpa til at tryggja, at tann vunni peningurin kemur vinnuni og serliga tí framleiðandi vinnuni tilgóðar, eru gjørdar ymiskar lógarbroytingar, og kunnu nevnast:

a. Flyting av negativari saldo millum teir einstøku kapitlarnar í avskrivingarlógini. T. d. kann nú negativ saldo, stavandi frá sølu av skipi, nýtast til íløgu í framleiðsluskapandi virksemi á landi.
b. Áður var tað møguligt at drena eitt partafelag uttan at gjalda skatt ella vinningsbýtisgjald. Hetta kundi gerast við at lata partabrøvini skifta eigara. Eftir nýggju reglunum verður vinningur við sølu av partabrøvum skattaður sum vanlig inntøka, tá eigarin hevur átt partabrøvini í minni enn 3 ár.
c. Avskrivingarmøguleikarnir hjá privatum vinnuvirkjum verða nú avmarkaðir eftir egnnýtsluni hjá eigarunum.
d. Avmarkingar eru gjørdar í avskrivingarmøguleikunum av serliga dýrum bilum.
e. Serlig lóg er gjørd fyri umskipan av privatum vinnuvirki til partafelag.

— — —

Revsireglurnar fyri brot á skattalógirnar vóru vorðnar ótíðarhóskandi og als ikki í samsvar við tilsvarandi reglur í grannalondum okkara.

Eftir verandi reglum kundi brot á skattalógirnar einans revsast við sekt, og kundi sektin, ið landsstýrið ásetti, verða upp til 5 ferðir ta upphædd, ið var útihildin, men praksis hevur verið at áseta sektina til einaferð ta upphædd, ið var útihildin.

Eftir nýggju reglunum verður brot á skattalógirnar revsað á liknandi hátt eins og onnur lógarbrot. Revsingin kann verða upp til fongsul í 2 ár undir serliga skerpandi umstøðum.

Eftir nýggju reglunum er eisini tann broyting farin fram, at umsitingin av vanligum sektarmálum er flutt frá landsstýrinum til líkningarráðið.

— — —

Tað var sokallaða sjálvstýrislandsstýrið, ið sat frá 1962 til 1966, ið álegdi føroysku peningastovnunum upplýsingarskyldu mótvegis líkningarráðnum.

Henda upplýsingarskylda merkti, at skattavaldið kundi fáa allar teir upplýsingar av skattligum týdningi, tað ynskti um hvønn einstakan kunda hjá einum peningastovni. Líkningarráðið kann eftir hesi reglu t. d. fáa avrit av hvørjum einstøkum kekki, ið ein ávísur persónur hevur skrivað eitt ár, ella hvørjari bankaflyting, hann hevur gjørt o. s. fr.

Nevnda upplýsingarskylda stendur við óbroytt, men liggur broytingin nú í, at heimild er skapt, fyri at nýta ta tøknifrøði, ið er vorðin tøk saman við samtíðarskattaskipanini, til automatiskt at útvega skattavaldinum ein part av teimum áðurnevndu upplýsingum, nevniliga upplýsingar um innistandandi og skuld við ársenda og upplýsingar um rentur. Talan er soleiðis ikki um, at skattamyndugleikarnir fáa beinleiðis atgongd til konti hjá spararunum, men møguleiki er tó framvegis hjá líkningarráðnum at skriva til peningastovnarnar smbr. heimildina frá 1963 og fáa nevndu upplýsingar.

Broytingin í upplýsingarskylduni merkir, at líkningararbeiðið kann gerast munandi

meira effektivt, og at samtíðarskattaskipanin kemur at arbeiða rættari og tryggari fyri skattgjaldaran.

— — —

Í byrjanini av skeiði sínum gjørdi landsstýrið ein nýggjan dupultskattasáttmála við donsku ríkisstjórnina, sum kom í gildi 1. januar 1987.

Í løtuni verður samráðst við hini norðurlondini um føroyska luttøku í felags norðurlendska dupultskattasáttmálanum og felags norðurlendsku »bistandsavtaluni«.

Roknast kann ikki við trupulleikum at koma við í norðurlendsku »bistandsavtaluna«, men hvat sjálvari dupultskattaavtaluni viðvíkur, er tað eitt sindur truplari at siga nakað enn; samráðingar verða í Føroyum fyrst í september mánaði, og aftaná hesar, kann væntandi sigast, um vit kunnu fáa nóg mikið av okkara ynskjum uppfylt, til tess at vit kunnu fara upp í avtaluna.

— — —

Fyrsti parturin av samtíðarskattaskipanini fór í gongd 1. apríl 1984, tá blivu tær fyrstu 3 skráirnar tiknar í nýtslu, men vóru stórir partar av skipanini enn eftir at gera.

Á ein hátt kann ein siga, at skipanin er liðug nú. Tær ætlanir, ið upprunaliga vóru gjørdar, eru settar í verk, so at vit í dag hava eina skipan koyrandi við 17 skráum.

Hinvegin kann eisini sigast, at samtíðarskattaskipanin ongantíð verður liðug. Ein so framkomin edv-skipan sum samtíðarskattaskipanin skal alla tíðina haldast viðlíka, og tillagingar skulu gerast samsvarandi broytingum í samfelagnum annars.

Landsstýrið hevur eisini avgjørt at nýta samtíðarskattaskipanina til aðrar uppgávur so sum:

1. fritíðarløn,
2. barnastyrk,
3. trygdargrunn løntakaranna og
4. arbeiðsmarknaðarevtirløn.

Hetta ern stórar uppgávur, ið her eru lagdar á P/F Elektron og umsiting likningarráðsins, og skotbráið, ið hesir stovnar hava fingið til at fáa hesar skipanir at virka, hevur verið stutt, og neyðugt hevur tí verið at útsett ávisar skattauppgávur sum t.d. framskundan av ársuppgerðini.

Orsøkin, til at landsstýrið hevur valt hesa loysn, er, at hon er munandi bíligari, enn um serstakar edv-skipanir og serstøk umsiting skuldi verið bygd upp fyri nevndu uppgávur.

Arbeiðið við útbygging av samtíðarskattaskipanini er gjørt í tættum samarbeiði millum Føroya Landsstýri, Likningarráð Føroya og P/F Elektron. Arbeiðið er farið fram á tann hátt, at landsstýrismaðurin í skattamálum sjálvur luttektur beinleiðis í stýrisbólkinum fyri samtíðarskattaskipanini.

Samanumtikið kann sigast, at samtíðarskattaskipanin er eitt dømi um, at vit í Føroyum megna at loysa størri edv-uppgávur (útlendingar vísa t.d. stóran áhuga fyri samtíðarskattaskipanini), bert spell, at nenda skipan framyvir kemur at verða dýrari, orsakað av at tann eini av luttakarunum í P/F Elektron flytir sínar edv-uppgávur til Danmarkar, og tað soleiðis verða færri um at bera tær fastu útreiðslurnar hjá P/F Elektron.

— — —

Áður hava einans Tórshavn og Klaksvík havt nakra veruliga skattaumsiting. Hetta merkti, at skattaálíkningin ikki var eins um alt landið, sum ásett er í skattalógini. Havnar kommuna vísti eisini fleiri ferðir á tað skeiva í, at tað skattliga skuldi vera lættari at búgva uttan fyri Havnina.

Við samtiðarskattaskipanini tingu vit eina skipan, har hvør einasta lønarútgjalding verður skrásett og viðgjørd, og merkti hetta eitt munandi størri samskifti millum skattgjaldara og skattavaldið.

Sum áður nevnt er samtiðarskattaskipanin eisini útbygd til at loysa aðrar uppgávur, trítiðarlønin og barnastyrkurin eru farin at virka, og arbeitt verður uppá trygdargrunn løntakaranna og arbeiðsmarknaðarettirløn, og fara hesar skipanir ætlandi í gongd um árskiftið 1988/89.

Landsstýrið setti sær ti sum mál at útbyggja skattaumsitingina, so at nevndu uppgávur kundu røkjast, og álikningin kundi bliva meira virkin og samlik.

Hetta kundi verið gjørt við at útbygt umsitingina í Tórshavn, men landsstýrið valdi heldur at skipa líkningarráðsdeildir í høvuðsøkjunum úti um landið, og er hetta arbeiðið um at verða liðugt. Seinastu deildirnar verða lætnar upp um einar tveir mánaðir, samstundis er havnðsskrivstova likningarráðsins umskipað í 4 deildir. Eisini eru tiltøk sett í verk fyri at útbúgva starvsfólkið í skattaumsitingini.

Tað, sum rokkið er við hesi útbygging, er:

a. Arbeiðsplássi eru flutt út á bygd.
b. Líkningin er vorðin samlik um alt landið.
c. Líkningin er eisini vorðin meira effektiv.
d. Tænastustøðið mótvegis skattaborgarunum er vorðið betri.

— — —

Síðan vit tingu samtiðarskattaskipanina, hava tað serliga verið tveir bólkar, ið havu verið nuisnøgdir við, at teir ikki kundu verða við í A-skattaskipanini, nevniliga tey danskt løntu í Føroyum og føroyingar við donskum fiskiskipum.

a. Danskt lønt: Her er júst fingin ein loysn, so danir nú eru farnir at avrokna um góðkend føroysk avrokningarstøð.
b. Føroyingar við donskum fiskiskipum: Her hava føroysku skattamyndugleikarnir ikki heimild at áleggja donsku arbeiðsgevarunum at avrokna um góðkend føroysk avrokningarstøð, men føroysku peningastovnarnir arbeiða við at fáa sjálvbodnar loysnir við danskar arbeiðsgevarar, men eftir hvat skilst, so visir hetta seg at vera treputt.

— — —

Seinast í juni mánað í ár samtykti fólkatingið at avtaka donsku sjómansskattalógina, og samstundis bleiv ein lóg samtykt um eina danska altjóða skipaskrá. Hetta merkir, at føroyingar, ið áður hava verið skattaðir eftir donsku sjómansskattalógini, nú vera skattskyldugir eftir føroyskari skattalóg.

Føroyingar, sum sigla við skipum skrásett undir donsku altjóða skipaskránni, eru ti verri fyri enn teirra donsku starvsbrøður. Arbeitt verður í løtuni við eini loysn av hesum spurningi.

— — —

Tá táverandi danski skattamálaráðharrin Isi Foigel var í Føroyum í 1986, gav hann lyfti um, at Føroyar skuldu fáa rættin at skatta eftirlønir frá donskum eftirlønargrunnum, sum verða sagdar upp í ótíð, og danskar kapitaleftirlønir, um móttakararnir búgva í Føroyum.

Um ein partur av útgjaldingini stavar frá inngjaldingum, ið viðkomandi hevur gjørt, meðan hann hevur verið skattskyldugur í Danmark, so skal hesin partur skattast í Danmark.

Danska skattamálaráðið hevur nú gjørt lógaruppskot hesum viðvíkjandi, og verður hetta uppskot lagt fyri fólkatingið í næstum.

— — —

Likningarráðið hevur seinastu tíðina arbeitt við at dagføra allar skattalógir. Hetta arbeiði er liðugt, og eru dagførdu skattalógirnar saman við kunngerðum, reglugerðum, rundskrivum, vegleiðingum, dupultskattasáttmála v. m. samlað í eina bók.

Orkuútbygging

Í røðuni í fjør var eg bjartskygdur viðvíkjandi eini fyrireiking, sum SEV og Orkuráðið vóru farin undir av útbygging av vatnorkuni í hæddini í Eysturoy.

Hóast Orkuráðið klettafast hevur ávist, at SEV tveitir 40% av orkuni burtur við at útbyggja í neðra, so er henda hildin fram í heimildarlóysi.

Metingin, um at skil kom at ráða, brast, og landsstýrið hevur tí í skeivari vón hjálpt SEV burtur úr teim figgjartrupulleikum, felagið í fjør hevði komið sær í við at læna 70 mill. kr. frá byggifelagnum, tó at teir longu høvdu bygt fyri meira enn 300 mill. kr. Loyvið til at læna hesar 70 mill. kr. eyka varð givið við teirri serliga tilskilaðu treyt, at ikki nýggj óheimilað lántøka bleiv framd. Kortini er hetta heist hent, síðan sin bygging, har bert 60% av hvørjari krónu komu til nyttu, heldur fram.

Serlig lánilreimild er veitt til upptøku av láni til motorútbyggingina.

Landsstýrið hevur játtað studulslán til eina verkætlan, sum Tórshavnar Kommuna og SEV hava um nýtslu av avlopshita til húsauppliting.

Annars hevur Orkuráðið latið frágreiðing um virksemi sítt, og er henda hjáløgd sum skjal. Forvitnisligt er arbeiði ráðsins við streymorkuverki í Vestmannasundi.

Íbúðamál

Tað tykist álisamt at vera stórur torvur á sethúsalánuni úr Húsalánsgrunninum, bæði til bygging av nýggjum húsum, til keyp av gomlum húsum og eisini til umbygging.

Í 1987 var talið av lánum 578. Samlaða útlánsupphæddin var 73 mió. kr. Á figgjarlógini fekk grunnurin 15 mió. kr., meðan restupphæddin varð útvegað við lántøkum her heima m. a. úr oljugrunninum, frá teimum ymisku tryggingunum o. s. fr.

Í 1988 og 1989 tørvar grunninum avikavist 101 og 106 mió. kr. Í ár er játtanin á figgjarlógini hækkað uppi 27 mió. kr. Umframt hetta hevur grunnurin fingið lán úr Oljugrunninum, Íløgugrunninum, Íleggingargrunninum fyri Føroyar og frá tryggingunum.

Higartil hevur Húsalánsgrunnurin tilsamans veitt 476,5 mió. kr. í lánum til sethús. Samlaða stovnsfæ grunnsins úr landskassanum er 146,4 mió. kr. Tey størstu einstøku útlánini eru nú 230.000 ,- kr.

Við verandi figgjarorku er Húsalánsgrunnurin bert førur fyri at veita 25% av ti samlaðu sethúsafiggingini. Eftir lógini kann grunnurin veita upp til 90%.

Ein fyribils setningur má verða, at grunnurin kemur uppá 50% av samlaðu figgingini, soleiðis at hesin saman við sparikassunum kundi figgjað tey 90%'lni.

Hóast nýggja lóg um íbúðagrunn og ávísar broytingar í lógini um rentustudning til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging, so verða hesir møguleikar ítið nýttir. Orsøkin er møguliga ov lítil upplýsing um hesar møguleikar.

Íbúðagrunnurin fær 1,5 mió. kr. á figgjarlógini. Samlaða stovnsfæið er nú 15,6 mió. kr. Rentustudningurin úr landskassanum til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging er 3%.

Almannamál

1. januar vórðu fólkapensión og avlamispensión hækkað ájavnt við pensiónina í Danmark á flest øllum økjum.

Heildarveitingin broytti ikki figgjarmynstrið fyri pensiónina, sum framvegis er 50%

donsk og 50% føroysk, men nakrar aðrar almannaveitingar vórðu broyttar soleiðis, at parturin hjá rikiskassanum nú er 25%. — Onnur øki eru broytt tann vegin, at figgjarliga ábyrgdin einans er hjá føroyskum myndugleikum. Talan er ner um iløgur og rakstur av røktarheimum, heimahjálp og fyri barnastyrk.

Við heildarveitingini fingu føroyskir myndugleikar eisini ábyrgdina av sjúkrakassunum, sum áður bert høvdu samskifti við rikisstýrið. Fyri sjúkrakassalóggávuna er nakað serligt galdandi — eins og fyri ávis onnur lógarøki. Heimastýrið kann av sinum eintingum gera broytingar í hesum lógum, sjálvt um tær eru samtyktar av fólkatinginum, og so koma tær føroysku reglurnar istaðin fyri reglurnar í verandi lóg.

Frá 1. januar varð eisini Andveikraverndin yvirtikin sum føroyskt mál. Útreiðslurnar vórðu áður rikisútreiðslur burturav, men eru nú landskassaútreiðslur.

Barnastyrkur, sum í byrjanini varð samtyktur at verða settur í mun til inntøku, er broyttur, og verður veittur uttan mun til inntøku.

Brennistudningurin til pensiónistar, sum kemur til útgjaldingar seinni í ár, er hækkaður til 2.200,- kr. og er samstundis eisini vorðin ein samskiftisstudningur, sum kann nýtast til at rinda part av útreiðslum til sjónvarps-, útvarps- og fast telefongjald.

Røktar- og umlættingarheimið »Lágargarður«, sum kommunurnar í Suðurstreymoy hava bygt, er tikið í nýtslu. Tað fer eisini at virka sum dagheim fyri heimabúgvandi gomul og brekað.

Í hinum norðuriondunum verða ikki slík heim bygd meira. Nú verða bygdar vardar íbúðir istaðin, har tey gomlu meira kunnu liva sítt egna lív. — Tey missa ikki pensiónina heldur, men galda húsaleigu o. a. sjálvi, so lengi tey eru før fyri tí.

Henda vegin eiga vit eisini at fara í Føroyum.

Tí arbeiðir landsstýrið í løtuni við at fáa betri møguleikar fyri, at vardar íbúðir kunnu verða bygdar, og umhugsar at seta lógina um kollegiubygging til at vera galdandi eisini fyri vardar íbúðir.

Í Klaksvík er vardur verkstaður tikin í nýtslu, og eitt umlættingarheim fyri evnaveik verður eisini skjótt klárt at taka í nýtslu har.

Vardi verkstaðurin í Vági er nærum liðugur at taka í nýtslu, og leiðari er settur.

Røktarheimsætlanirnar í Sandoy eru komnar so langt, at byggingin skjótt kann byrja, og vónandi verða ætlanirnar um heim í Norðurstreymoy framdar nakað skjótt.

Í sambandi við hjálp til gomul, brekað fólk, vil landsstýrið seta ein sertækna fyri gomul.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við málinum um at seta á stovn ein kærustovn fyri avgerðir á almannaøkinum. Enn er ikki greitt, um stovnurin einans skal avgreiða mál um endurbúgving og hjálpartól, ella stovnurin eisini skal taka sær av øðrum málum, t. d. viðvikjandi forsorgarhjálp og bjálvingarstuðulsláni.

Arbeitt verður eisini við at seta á stovn ein barna- og møðranjálparstovn, sum stuðuls- og ráðgevingarstovu hjá teimum, ið søkja fosturtøku.

Somuleiðis verður arbeitt við málinum um, hvussu fólka- og avlamispensiónistar kunnu fáa meira burturúr tí arbeiðsinntøku, tey hava aftrat pensiónini, og ikki — sum nú — missa allar viðbøtur.

Miðspjaðingarnevndin er nú liðug við arbeiði sitt. Ætlan landsstýrisins er at byrja í hesum ári við at leggja sosialar deildir út á bygd, eina í hvørja sýslu.

Kommunumál

Í royndunum at fyriskipa desentralisering av almennum stovnum eru nú likningardeildir settar á stovn í hesum bygdum:

Klaksvik, Fuglafirði, Runavik, Kollafirði, Sandavági, Skopun og í Vági.

Arbeiðseftirlitið hevur somuleiðis fingið skrivstovur á bygd.

Kommunali lánigrunnurin fekk av yvirskoti landskassans fyri 1986 játtað 40 milliónir kr., sum var eitt munagott ískoyti til grunnin.

Fyri at tálma ti yvirupphiting, sum hevur verið í byggivirkseminum á landi, hevur landsstýrið verið afturhaldandi við at geva loyvi til ótálmað lán til kommunur og biðið kommunur steðga við teimum arbeiðum, sum tola at bíða.

Hetta er gjørt fyri at skapa skipum og fiskavirkjum betri arbeiðskor, tá tey nú eina tíð hava havt tortørt við at skaffa manning og arbeiðsfólk, og tískil hava noyðst at sent boð til útlandið eftir skipsmonnum og arbeiðsfólki.

Arbeitt verður við tankanum um at broyta kommunalu vallógina soleiðis, at tær smærru bygdirnar fáa møguleika at verða umboðaðar í størri kommunalum samanhangi.

Skúli og undirvísing

Landsstýrið hevur lýst Løgtingslóg nr. 62 um ávísar skúlar, og landsstýrið hevur heitt á Landsskúlafyrisitingina um at fara undir at fyrireika projektering og bygging av teimum skúlabygningum, sum nar eru umroddir, og gjørt vart við, hvørjir skúlar, ið eiga at koma í fremstu rað.

Landsskúlafyrisitingin er farin undir fyrireikingarnar til tess at sera á stovn yrkisskúla fyri fiskaidnað og havbúnað í Vestmanna, so at hann kann byrja í leigaðum hølum í januar komandi ár. Ætlanin er eisini at fáa tøkniligan yvirbygnað til hendan skúla, sum eisini skal hava deild í Vágum.

Á Føroya Maskinskúla hevur nú tann fyrsti flokkurin tikið viðkað maskinmeistaraprógv, og farið er undir at fyrireika upptøku av næmingum til installatørútbúgving, so at fyrsti flokkurin kann byrja í januar 1989. Ætlanin er eisini at fara undir dugnaskapsroynd í motoransing frá 1. januar komandi ár. Landsstýrið hevur biðið Landsskúlafyrisitingina gera uppskot um lóg um maskinmeistaraútbúgving, so vit fáa føroyska lóggávu á øllum hesum útbúgvingarøki.

Í hesum árinum verður farið undir nýggja skiparaútbúgving, sum samanlagt fer at vara 18 mánaðir. Eftir 12 mánaðum kunnu næmingarnir taka heimaskiparaprógv og halda fram í 6 mánaðir til skiparaprógv.

Skipskokkaútbúgvingin verður umskipað, soleiðis at hon kemur at fevna um grunnskeið, starvslærutíð og skipskokkaskeið. Øll útbúgvingin kemur tilsamans at vara í 3 ár.

Umbyggingin á sjómansskúlanum er um at vera liðug, og støða skal takast til útbjóðing av uppibyggingini.

Landsskúlafyrisitingin arbeiðir við uppskoti um eina heildarætlan fyri útbúgvingar á teknisku skúlunum. Dentur verður lagdur á, at útbúgvingin á teknisku skúlunum eisini fer at fevna um útbúgvingar innan matvøru og matvøruidnað.

Byggiteknikaraútbúgvingin, sum ætlað var at fara undir nú í august mánaði, verður at bíða til januar.

Skeiðætlanin til landmálarateknikaraútbúgvingina er liðug og góðkend.

2. byggistig av Tekniska Skúla í Klaksvík gongur eftir ætlan, og verður nevnda útbygging liðug komandi ár.

Verkstaðarskúlin, sum vit roknaðu við at fara í gongd við nú í august í Klaksvik, fer ætlandi í gongd um ársskiftið.

Nevnd arbeiðir við uppskoti um broytingar í studentaskúla- og HF-skipanini, og miðað

verður ímóti, at nevndin verður liðug við arbeiði sitt, so at farast kann undir ta nýggju skipanina á heysti 1989.

Við Føroya Studentaskúla og HF-skeið er settur fakráðgevari í føroyskum, og við hesum er skipan nú fingin um, at lærarar við føroyskum sum høvuðs- ella hjágrein kunnu taka pedagogikum í føroyskum. Hetta fer at menna móðurmálsundirvisingina á nevndu skúlum.

Á Føroya Handilsskúla er skipað fyri møguleika at fara undir HD-útbúgving. Hetta kemur væl við hjá handils- og vinnulivsfólki, sum aftan á vanliga arbeiðstið kunnu taka HD-útbúgving á kvøldskeiði.

Ætlanin er, at Handilsskúlin á Kambsdali verður tøkur til skúlagongd komandi summar.

Sum kunnugt hevur leingi verið í umbúna at seta sjúkrahjálpara- og sjúkrarøktara-útbúgving á stovn í Føroyum. Nú sær tað út til, at henda ætlan verður veruleiki.

Tann námsfrøðiliga útbúgvingin á Føroya Læraraskúla fyri fólki, ið skal arbeiða á dag- og bústovnum og innan frítíðarvirksemi, hevur higartil hepnast væl sum ein royndarskipan, og ætlanin er nú at seta útbúgvingina veruliga á stovn og at taka ein nýggjan flokk uppaftur í januar 1989.

Nevnd verður sett at kanna, um tørvur er á at seta á stovn sosialráðgevaraútbúgving í Føroyum, og um tørvur er á hesi útbúgving at gera uppskot um slíka.

Nevndin, sum skal gera uppskot um nýggjar leslætlanir fyri fólkaskúlan og endurskoða fólkaskúlalógini, er komin væl áleiðis við arbeiði sínum.

Serundirvísingarnevndin hevur lagt fram uppskot, sum enn eru arbeiðsstilfar hjá Landsskúlafyrisitingini, um sernámsfrøðilig skúlaøki og um, hvussu Skúlin á Tróndi eigur at verða bróttur.

Menningin innan frítíðarundirvisingina hevur verið stór hesi árini. HF-stakgreinaskeið og skeið til stakgreinaundirvísing til fráfaringarroyndir fólkaskúlans umframt yrkiskend skeið og serundirvísing fyri fólk fyri skúlaaldur, er sett á stovn ymsastaðni í landinum, og tey eru mong, ið taka undir við hesum tilboði.

Musikkskúlin, ið hevur tøkur ár á baki sum skipan fyri alt landið, hevur fingið góða undirtøku, og stavnhaldið, at so nógv børn og ung sum gjørligt skulu hava í boði musikkundirvísing á høgum stigi, er rakkið víða um landið.

Tað verður innrættað Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð. Leiðari er settur, og onnur fólk verða sett honum til hjálpar, áðrenn langt umlíður.

Vaksandi játtan á fíggjarlógini til gerð av undirvísingartilfari á føroyskum hevur nú sýnt seg við øktum útgávuvirksemi børnum og ungdómi okkara til frama.

Vit kunnu taka samanum og siga, at hetta landsstýrið hevur lagt lunnar undir og skapt fortreytir fyri framhaldandi menning og gróðri innan skúla og undirvísing til gagns fyri øll, ið her balast og liva.

Arbeiðaramál

Setningurin, ið settur varð, tá ið hetta landsstýrið tók við, er nærum rokkin.

Í 1985 samtykti landsstýrið eina ætlan um útbygging av arbeiðseftirlitinum við deildum kring landið. Higartil er deild sett á stovn í Norðoyum, í Suðuroy og í Eysturoy. 1. januar 1989 verður tann seinasta sett á stovn. Henda skal umfata Vágoy og Norðstreymoy.

Sama ætlan fevndi eisini um skipan av einum arbeiðsumhvørvisráði og skipan av starvi sum sertækni í arbeiðsmedisini. Arbeiðsumhvørvisráðið er valt og mannað við umboðum frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og við stjóranum á Arbeiðseftirlitinum sum

formanni. Í løtuni arbeiðir arbeiðsumhvørvisráðið við at gera uppskot til arbeiðsumhvørvislóg. Serlæknin í arbeiðsmedisini varð settur í starv frá 1. juli í ár.

1. september í ár fær Arbeiðseftirlitið ein ergoterapeut. Hesin skal leiðbeina og ráðgeva virkjum innan ergonomi.

Í september í fjør varð ein norðuratlantisk ráðstevna um arbeiðsumhvørvið í fiskiíðnaðinum hildin í Føroyum. Hetta var næsta norðurlendska ráðstevnan av sínum slag, men tann fyrsta norðuratlantiska, har meginparturin av luttakarunum komu úr norðuratlantisku londunum. Alt vóru 130 luttakarar á stevnuni. Hesir komu frá pørtum á arbeiðsmarknaðinum og frá viðkomandi almennu stovnunum.

Í 1986 fingu vit nýggja lóg um fritíð við løn. Sambært nýggju lógini skal fritíðarprosentið hækka úr 9½% uppi 12% eftir trimum árum. T. v. s. at frá 1. apríl í ár er fritíðarprosentið 12. Somuleiðis verður fritíðin longd úr fýra upp í fimm vikur, eisini í trimum stigum. Í 1989 er fritíðin fimm vikur.

Við heimild í lógini um fritíð við løn hevur landsstýrið samtykt eina kunngerð um virksemi og fyrisiting av almenna fritíðargrunninum. Stovnar og feløg, sum hava til endamáls at skapa løntakarum fritíðarmøguleikar, kunnu søkja grunnin um lán og stuðul. Í løtuni eigur grunnurin 5.5 mió. kr. Árliga inntøkan hjá grunninum er umleið 2 mió. kr.

Í tingsetuni 1986 varð lógin um Trygdargrunn Veiðumanna broytt, soleiðis at grunnurin eftir hetta veitti trygd til teirra, sum arbeiða á fiskavirkjum. Í tingsetuni 1987 varð lógin um trygdargrunn aftur broytt. Grunnurin ber nú heitið: »Trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir v. m.«. Endamál grunsins er at tryggja øllum løntakarum lønarágóða og øllum skipa- og bátaeigarum avrokning fyri fisk, sum er avreiddur til føroysk fiskavirki, tá ið arbeiðsgevari ella fiskavirki t. d. kemur í fíggjartrot (konkurs).

Í seinastu tingsetu samtykti tingið lóg um *Samhaldsfastan Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn*. Lógin fær gildi frá 1. januar 1990. Tá skulu arbeiðsgevarar og løntakarar rinda hvør sítt prosent inn í grunnin. Hetta tinggjald hækkar stigvist, til tað í 1999 kemur uppá 2% frá hvørjum. Fyrstu útgjaldingarnar úr grunninum fara fram frá 1. januar 1992. Øll fáa lut í arbeiðsmarknaðareftirlønini, og tá ið útgjaldingin er komin í fulla hædd, verður hon at svara til umleið 50% av galdandi fólkapensión. Spurningur er, um ikki rætt er at broyta lógina, so skipanin tekur við 1. mai 1989.

Á arbeiðsmarknaðarøkinum kannar og umhugsar landsstýrið eina fast- ella minstulønarskipan fyri fólk á fiskavirkjum. Landsstýrið hevur kannað íslendsku skipanina og biður nú eftir, um íslendingar lata hesa skipan galda viðari, um hon verður sett úr gildi ella verður galdandi við ávísum broytingum.

Hóast uppskot landsstýrisins um javnstøðulóg ikki varð samtykt, so fylgir landsstýrið væl við, hvat fyriferst uttanum okkum á javnstøðuøkinum.

Í juni mánaði í ár hevði javnstøðunevndin hjá norðurlendska ráðharraráðnum fund í Føroyum við tí endamáli at gera eina norðurlendska verkætlan um javnstøðu fyri tey næstu fimm árini. Javnstøðunevnd landsstýrisins var umboðað á hesum fundi.

Í komandi viku verður hildin javnstøðuráðstevna í Oslo, har allir teir norðurlendsku javnstøðuráðharrarnir luttaka, eisini okkara landsstýrismaður í javnstøðumálum.

Samferðslumál

Samferðslumálini eru lýst í fylgiskjølum frá landsverkfrøðingsstovninum, men tvær serstórar iløgur standa fyri, og skulu tær nevnast serstakt.

Ferjulega á Gomlu rætt saman við havnabygging í Skopun og undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi, verða tung at lyfta, men soleiðis sum miðdeplaútviklingurin hevur tikið

seg upp, er forsvarligt at styrkja møguleikarnar hjá Vágoynni, Sandoynni og Suðuroynni at fáa lut í menningini. Hetta seinasta gerst so fyribils frægast við at útbyggja ferju- og tyrlusambandið við Suðuroynna so nógv, sum til ber.

At undirsjóvartunnilin fær eina munandi sjálvfigging kann bert metast stórur fyrimunur.

Landsstýrið hevur í ætlan sini um endurskipan av umsitingini í Tinganesi í hyggju at skipa viðgerðina av landsstýrisins parti av samskiftismálum í serstaka deild við deildarleiðara. Søkt verður eftir slíkum fyrsta dagin.

Flogferðsla

Samferðslusøga varð skrivað, tá vit sjálvir settu á stovn flogfelag: Atlantic Airways.

11. juni 1976 varð gjørt greitt í fólkatingskunngerð, at 1. oktober 1985 bleiv einkarrættur DDLs at reka innlendis ella altjóða rutuflogferðslu í/úr Føroyum tikin av.

26. mars í ár kom flogfarið RA 146 hjá Atlantic Airways til Føroyar, og longu 28. mars byrjaði reglulig rutuflúgving Vágar/Keypmannahavn.

Føroyingar eiga 51% av partapeninginum í Atlantic Airways og Cimber 49%, og føroyingar kunnu yvirtaka størri part frá Cimber Air, tá nøkur ár eru liðin.

Avtalað er, at Cimber Air skal átaka sær at úthúgva føroyingar innan loftferðslu: flogskiparar, mekanikarar, flogternur, fyrisitingarfólk og onnur neyðug starvsfólk, sum skulu til fyri at reka eitt vælvirkandi flogfelag. Eini 20 til 25 fólk.

Sum kunnugt er Cimber Air dømt at fara úr samarbeiðinum við Atlantic Airways. Í løtuni verður arbeitt fyr at finna eina loysn á hesum spurningi.

Annar merkisdagur í flogsøgu føroyinga er 1. desember 1985, tá ið vit sjálvir yvirtóku operativu og teknisku umsitingina av tyrlutænastuni her á landi og sostatt stóðu á egnum beinum.

Miðvist hevur verið arbeitt við at útbyggja tyrlutænastuna, og í dag hava vit Snipuni og Vipuni vunnið væl framá, sjálvt um týðandi spurningar eru eftir at loysa.

Nú eru moguleiki at taka ábyrgdina av sjúkraflutningi, at flúgva til verju av sjómarkinum, at gera uppgávur fyri stovnar, feløg og einstaklingar.

Seinna tyrlan sparir tyrlutænastuni upp í 2 mill. kr. áriga í »back-up« útreiðslum, soleiðis at keypspeningurin er vunnin inn aftur eftir 3-4 árum.

Ynski landsstýrisins hevur verið, at ein tyrla skal vera tøk alt døgnið, og soleiðis m. a. tryggja útoyggjafólki tryggan flutning alt árið.

Tyrlutænastan flytur til Vágarnar, so skjótt hetta tekniskt letur seg gera.

Nýggj lóg um loftferðslu er komin í gildi í Føroyum. Hon kom istaðin fyri lógina frá 1923, sum hon varð broytt í 1937.

Nýggja loftferðslulógin er sett í gildi við kgl. fyriskipan, og er tað lóg nr. 252 frá 10. juni 1960 um loftferðslu við seinni broytingum.

Spurningurin um at seta nýggja loftferðslulógina í gildi í Føroyum hevur verið tengdur saman við spurninginum um loysn av millumlandaflúgvingini.

Statens Luftfartsvæsen hevur gjørt eina fimm ára íløguætlan fyri flogvøllin í Vágum. Ætlanin er fram til 1993 at orúka uml. 60 milj. kr. til umsiting og nýggjar íløgur:

1988 0.525 milj. kr.	1990 12.490 milj. kr.	1992 19.360 milj. kr.
1989 4.750 milj. kr.	1991 4.495 milj. kr.	1993 17.140 milj. kr.

Landsstýrið hevur íløguætlanina til viðgerðar í løtuni.

Telefonverkið

Telefonskipanin verður framhaldandi útbygd í høvuðsheitum smbr. 5-ára útbyggingarætlanina, ið varð samtykt av løgtinginum á vári 1986.

Í mun til hesa ætlan eru figgjarviðurskiftini munandi batnað, grundað á lægri dollaravirði, vaksandi inntøku og lægri vøkstur av útreiðslunum. Hetta hóast takstirnir hava verið óbroyttir øll hesi trý árini 1986, 87 og 88.

Útbygging, sum er í gerð, og er og verður framd í 1988, er Klaksvíkarstøðin. Hon er økt við 1000 telefonnumrum uppí 3000 nr. Um 20. oktober 1988 verður nýggj støð við 3000 nr. sett til í Runavík, og tann gamla við 1600 nr. tikin úr nýtslu. Hetta tiltak verður at bøta munandi um alla telefonskipanina í Eysturoynni.

Í Suðuroynni eru Sumba og Hvalba digitaliserað, og um miðjan september í ár verður Tvøroyri digitaliserað. Seinni í vetur kemur Vágur uppí hesa skipan, men longu í sept., tá ið Tvøroyrar-støðin verður umløgd, verða telefonviðurskiftini í Suðuroynni sum heild í lagi.

Uppsetingin av Nordisk Mobil Telefon, sum virkandi partur av NMT-skipanini í hinum norðurlondunum, er komin væl áleiðis.

L. M. Ericsson verður at roynd arkoyra skipanina í sept.-okt. 1988, og telefonverkið ger endaligu yvirtøkuroyndirnar í nov.-des. 1988. Møguliga kunnu felagar nýta skipanina longu í royndartíðini nov.-des. í ár, men endalig støða valdast, hvussu royndarkoyringin gongst.

Serlig NMT-telefonstøð til 4000 felagar er uppsett á telegrafstøðini, og 1. januar 1989, tá ið royndarkoyringarnar eru lidnar og skipanin tikin í nýtslu, verða til taks niggju ymiskar radiostøðir um alt landið við 96 radiorásum. Seinni koma fleiri støðir aftrat.

Nýggja 200-kW millumbylgjustøðin í Akrabyrgi er nú í gerð og verður liðug í summar. Heta er eitt gamalt ynski, serliga hjá sjómonnum, sum nú er vorðin veruleiki.

Sum fráboðað í seinastu løgmansrøðuni, hava drúgvar samráðingar verið millum Post- og Telegrafvæsenet, Telefonverkið, GN Store Nordiske Telegrafselskab og landsstýrið um yvirtøku av Telegrafstøðini.

Sjálv yvirtøkan fer fram nú 1. august 1988, og frá sama degi verður Telegrafstøðin ein partur av bygnaði telefonverksins.

Drúgvar samráðingar hava verið um at tryggja setanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum á Telegrafstøðini aftan á eina yvirtøku. Hóast endalig avgreiðsla av samráðingarúrslitinum enn ikki er farin fram, so metir landsstýrið, at úrslitið er til frama fyri allar partar.

Í samband við samráðingarnar um Telegrafstøðina hava eisini verið samráðingar um onnur samskiftisviðurskifti á teleøkinum viðvíkjandi Føroyum, Danmark og útheimin. Hesar samráðingar hava sum úrslit, at í maj-juni 1988 varð undirskrivaður samstarvssáttmáli við heitinum »Aftale mellem Generaldirektoratet for P&T og Telefonverk Føroya Løgtings på vegna af Føroya Landsstýri om de overordnede rammer for varetagelsen af telekommunikationsopgaverne på Færøerne«.

Avtalan er skjal til hesa frágreiðing.

Postverk Føroya

Landsstýrið hevur sett eina fyrireikingarnevnd til at fyrireika bygging av høvuðspost-húsi í Havn. Nevndin hevur fingið til uppgávu at lata landsstýrinum tilmæli í málinum: kostnað og húsarúmd o. a.

Posthúsbyggingin í Saltangará er byrjað. Útgrevsturin er um at verða liðugur, og fyrsta dagin verður støða tikin til útbjóðingartilfarið.

Posthús skal eisini byggjast á Tvøroyri, og hendia bygging er sambygging við aðrar, eitt nú P/F Føroya Banka.

Eisini verður arbeitt við ætlanum um at byggja posthús í Sørvági. Kostnaðarætlan og skitsuuppskot verður gjørt í løtuni.

Lógarmál

Í apríl 1987 setti landsstýrið nevnd at kanna møguleikan fyri at yvirtaka skipaeftirlitið. Higartil hevur nevndin hildið sjey fundir, og væntandi verður hon liðug við arbeiðið beint eftir summarfrítíðina. Landsstýrið skal tá taka støðu til, um samráðingar skulu verða við ríkismyndugleikarnar um hesa yvirtøku.

Orsøkin, til at spurningurin um yvirtøku av skipaeftirlitinum gerst átroðkandi beint nú, er tann, at ein ávís umskiping fer fram í Danmark, soleiðis at »Statens Skibstilsyn« ikki er til longur, men er lagt undir »Søfartsstyrelsen«. Annars er kannan av hesi eisini partur av samgonguskjalinum frá 1985.

Í fleiri ár hevur serliga ferðslulógarnevndin hjá landsstýrinum givið tilmælir um broytingar í ferðslulógini. Landsstýrið hevur beint nú heitt á ferðslulógarnevndina um at fara undir eina nýggja gjøgnumgongd av lógini.

Í nevndu áheitan hevur landsstýrið lagt dent á tveir spurningar. Annar spurningurin er eitt royndarkoyrikort. Hetta skulu allir bilførarar hava tvey tey fyrstu árini, og hetta koyrikortið skal hava ávísar avmarkingar í mun til tað vanliga koyrikortið.

Hin spurningurin er hámarksferðin. Her hevur landsstýrið heitt á serligu ferðslulógarnevndina um at kanna møguleikan fyri eini skipan við stigum, soleiðis at bilførarar, sum ferð eftir ferð bróta reglurna um hámarksferð, skulu missa rættin at koyra akfar.

Dálking — Umhvørvi

Umhvørvisdáling er farin at gera veruliga vart við seg seinastu árini.

Hon kennir sum kunnugt ikki landamark, og eru í seinastuni komin slík sløg av dálking uppá tal, at vit kenna eitt ávist mánaloysi.

Kortini er neyðugt, at vit fylgja so væl við sum gjørligt og ávirka í tann mun, vit megna, til tess at fyribyrgja vanlukkum, sum vit valla duga at hugsa okkum fylgjurnar av.

Her heima komu vit eitt stig longri, tá løgtingið í vár samtykti umhvørvislógina. Hetta er ein umfatandi lóg, og eftir er nú at uppbyggja umsitingina soleiðis, at tankarnir í lógini gerast veruleiki.

Mentunarmál

Tað er eingin ivi um, at leiklistin í Føroyum hevur havt trong kor at arbeitt undir seinastu mongu árini.

Hinvegin kann ikki sigast tað sama um karmarnar um sjálva leiklistina, nevniliga tey mongu bygda- og ungdómshúsini, og sjónleikarahús, sum komin eru, síðani lógin kom í gildi í Føroyum.

Studningurin til ungdóms- og bygdahúsini er í løtuni 30% av kostnaðinum, meðan studningurin til pall, ljóð og ljós hevur verið 50%.

Nú eru so ætlanir frammi um at seta á stovn ein sjálvsognarstovn, sum fær heitið »Leikpallur Føroya«, sum skal hava til endamáls at menna leiklistina og at verða ráðgevi landsstýrisins, tá tað snýr seg um bygda- og ungdómshús, sjónleikarahús og leiklistina sum heild.

— — —

Landsstýrið hevur sett nevnd at virka fyri at táa heim til lands skjøl, ið eru úrgripir í søgu okkara og mentan okkara, og nú donsk-føroysk »arkivavtala« er gjørd, er leiðin løgd til at fara viðari, eitt nú at fara undir samráðingar við svíar um Kongsbókina.

— — —

Arbeiðsbólkur hevur greitt úr hondum álit um tjóðsavn í Hoyvík. Málsetningurin í álitinum er at hava slíkt savn tíðugt útbygt, áðrenn henda øldin er runnin. Landsstýrið ætlar at margfalda hesa ætlan at lata tingmonnum til kunningar.

— — —

Tilgongdin til Fróðskaparsetur Føroya er vaksandi, og tykist tann útbúgving, her kann nemast, at standa mát við líknandi útbúgvingar uttanlands.

Samvinnan við lærdar háskúlar í grannalondum okkara hevur staðið sína roynd, og er hetta, at vit nú útbúgva okkara ungu longri part av læruskeiðini heima hjá okkum sjálvum, eitt sjálvsagt samfelagsgagn.

— — —

Støðan viðvíkjandi høllisligu og figgjarligu trupulleikum sjónvarpsins er lítið broytt í mun til í fjør. Tó hevur verið arbeitt við at útvega sjónvarpinum onnur høli, men er verkætlanin sera dýr.

Landsstýrið hevur givið sjónvarpinum heimild til at útvega sær eykainntøkur við lýsingum, men vaila sleppst undan at økja boðleiðis játtanirnar komandi.

Undirgrundin

Samgongan hevur roynt at brynja seg til enn eitt samráðingarumfar um at gera málsøkið Føroya undirgrund til sermál.

Løgmaður setti ein arbeiðsbólk at útvega okkum eyka prógvilfar og lýsa spurningin úr fólkarættarligum, ríkisrættarligum sýni og annars við atliti til møguligar avmarkingar, sum gerast mugu við danir áðrenn yvirtøkuna.

Nevndin hevur greitt eitt sera nágreinaligt og fevnandi álit úr hondum, og meti eg, at vit eru væl betri fyri.

Tilfarið er av slíkari náttúru, at tað ikki verður almannakunngjørt, áðrenn samráðingar hava verið.

Í fyrstu syftu verður hetta álit til at viðgera í sjálvari samráðingarnevndini fyri afturlatnum hurðum, ið hvussu er, til vitað er, um danir eru sinnaðir at koma í veruligar samráðingar.

Nýtt lógting

Samgongan gongur óskammað fram fyri dóm veljarans í heyst.

Vit tóku við búgvi, sum hóast sterkt í grundini — tað eru Føroyar og fólkatilfarið á hesum oyggjum — hevði stórar trupulleikar, og lata frá okkum búgv munandi styrkt og konsoliderað.

Sjálvsagt eisini við trupulleikum og nógvum vandamálum komandi, men sum ávist framman fyri við størri frælsi í vali av møguleikum og amboðum, serliga á búskaparliga økinum.

Tað er munin hugaligari at virka fyri at loysa trupulleikar av ov nógvum arbeiði enn at laga upp í lið, sum komin eru í, av tí at onki er fyri hendurnar.

Vit fara ikki til valið at gykla fólki »dans á rósum«, men siga hart og ættiga, at avmarkandi politikkurin, ríkin hevur verið seinastu trý árini, má fasthaldast og í ávísan mun herðast.

Vit gera greitt, at onki gildi er ókeypis, rokningin kemur so ella so, tí ber ikki til at lova skatta- ella tolllætta, og heldur ikki til at lova risavøkstur í almennum tænastuveitingum.

Lata vit breiðastu og sterkastu herðarnar bera, kann tó ein ávís umfordeiling fremjast, so ikki tyngist um hjá vanligum fólki.

Vit gykla heldur ikki, at tað ber til at fremja veruligan vinnulívspolitikk — heldur ikki sokallaðan vinnulívs vinarligan — bert við at troðka fram at landskassanum.

Hesin skal hvørki hava hol í botni ella lok, sum fýkur av, tá tað lotar úr hanakjafti.

Vónandi gevur veljarin okkum eitt løgting, soleiðis sett saman, at allir samfelagsbólkar kenna seg tryggar.

Nøgdar við at teir táa part í felagsognini, og tróar um, at hava lagt sín góða lut til tað solidariska heim, vit skapa okkum her.

Tingnevndir

Valdar 3. august 1988

Fíggjarnevnd:

Fastir limir:	Tiltakslimir:
1. Jørgen Thomsen	Jákup Lindenskov
2. Signar Hansen	Hergeir Nielsen
3. Asbjørn Joensen	Hilmar Kass
4. Adolf V. Hansen	Tórálvur Mohr Olsen
5. Ivan Johannesen	Johs. M. Olsen
6. Poul Michelsen	Anfinn Kallsberg
7. Flemming Mikkelsen	Pauli Ellefsen

Marknaðarnevnd

Fastir limir:	Tiltakslimir:
1. Hendrik Old	Tórálvur Mohr Olsen
2. Hilmar Kass	Asbjørn Joensen
3. Karin Kjølbro	Hans J. Debes
4. Hergeir Nielsen	Øssur av Steinum
5. Jógvan Sundstein	Eyðun Viderø
6. Olaf Olsen	Svend Aage Ellefsen
7. Pauli Ellefsen	Agnar Nielsen

Fiskivinnunevnd:

	Tiltakslimir:
1. Tórálvur Mohr Olsen	Henrik Old
2. Hilmar Kass	Asbjørn Joensen
3. Adolf V. Hansen	Hergeir Nielsen
4. Signar Hansen	Heini O. Heinesen
5. Jógvan I. Olsen	Eilif Samuelsen
6. Olaf Olsen	Svend Aage Ellefsen
7. Ivan Johannesen	Agnar Nielsen

Rættarnevndin

Fastir limir:

1. Jóannes Dalsgaard
2. Jákup Lindenskov
3. Hans Jacob Debes
4. Jógvan Sundstein
5. Eilif Samuelsen.

Samferðslunevnd:

1. Tórálvur Mohr Olsen
2. Asbjørn Joensen
3. Adolf V. Hansen
4. Heini O. Heinesen
5. Eyðun Viderø
6. Svend Aage Ellefsen
7. Johs. M. Olsen

Ídnaðarnevnd:

1. Sverre Midjord
2. Poul J. Olsen
3. Heini C. Heinesen
4. Olaf Olsen
5. Eilif Samuelsen

Arbeiðsmálanevndin:

1. Hendrik Old
2. Tummas Arabo
3. Øssur av Steinum
4. Jógvan Sundstein
5. Ivan Johannesen

Skattanevndin

Fastir limir:

1. Sverre Midjord
2. Heini O. Heinesen
3. Hilmar Kass
4. Jógvan Sundstein
5. Agnar Nielsen

Almanna- og heilsunevnd:

1. Jákup Lindenskov
2. Adolf V. Hansen
3. Karin Kjølbro
4. Jógvan Sundstein
5. Flemming Michelsen

Landbúnaðarnevnd:

1. Hendrik Old
2. Øssur av Steinum
3. Heini O. Heinesen
4. Eyðun Viderø
5. Jógvan Olsen

Mentannar- og skúlanevnd:

1. Jóannes Dalsgaard
2. Asbjørn Joensen
3. Hergeir Nielsen
4. Óli Breckmann
5. Eilif Samuelsen

Landsstýrismálanevndin:

1. Hergeir Nielsen
2. Tummas Arabo
3. Óli Breckmann

Norðurlanda Ráðið:

Fastir limir:

1. Jákup Lindenskov
2. Jógvan Sundstein

Tiltakslimir:

3. Jóannes Dalsgaard
4. Anfinn Kallsberg

Umhvørvisnevndin:

1. Jóannes Dalsgaard
2. Hans J. Debes
3. Øssur av Steinum
4. Anfinn Kallsberg
5. Johs. M. Olsen

Tingmannaráð Útnorðurs:

Fastir limir:

1. Tummas Arabo,
2. Hans J. Debes
3. Asbjørn Joensen
4. Tordur Niclasen
5. Jógvan Sundstein
6. Agnar Nielsen
7. Adolf V. Hansen

Tiltakslimir:

1. Jóannes Dalsgaard
2. Karin Kjølbro
3. Hilmar Kass
4. Tórálvur Mohr Olsen
5. Anfinn Kallsberg
6. Pauli Ellefsen.

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 8. august 1988.

F. L. j. nr. 1010-34
(at tilskilja í svari)

Tlf. 11088. Telex 81235 lingva fa. Telefax 14942. Postboks 64
Afgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

KlH/3H

Førcya Løgting.

Løgtingsmál nr.1/1988: Løgtingslóg um vardar íbúðir.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um vardar íbúðir.

§ 1.

Eftir reglunum í hesi lóg verður studningur latin til vardar íbúðir, sum hava til endamáls at hýsa avlamisfólki og eldri fólki, og fólki annars, sum tørva at búgva í vardum umhvørvi, og tryggja teimum eitt gott og hóskandi tilhald.

§ 2.

Studningur verður latin til:
1) bygging av nýggjum vardum íbúðum,
2) keyp og umbygging av verðandi bygningum til vardar íbúðir,
3) rakstrarstudning til rentur og avdráttir.

laatingslov om beskyttede boliger.

§ 1.

Efter bestemmelserne i denne lov ydes tilskud til beskyttede boliger for handicappede og for ældre mennesker, og mennesker, som ellers trænger til at bo i beskyttede omgivelser, og derved at sikre dem en god og passende bolig.

§ 2.

Tilskud ydes til:
1) opførelse af nye beskyttede boliger,
2) køb og ombygning af værende bygninger til beskyttede boliger,
3) drift af beskyttede boliger til renter og afdrag.

§ 3.

Studningur kann veitast upp til 40% av byggikostnaðinum ella av keypsprísi og umbyggingarkostnaði.

§ 4.

Studningurin verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán við pantirætti í ognini innanfyri 90% av virðinum.

§ 5.

Í rakstrarstudningi kann veitast upp til 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum.

§ 6.

Studningurin verður latin til stovnar, sum einans hava til endamáls at byggja (stovnseta) og reka vardar íbúðir. Stovnurin skal vera sjálveigandi stovnur og hava viðtøkur, sum eru góðkendar av landsstýrinum.

2. stk. Verða vardu íbúðirnar ikki longur nýttar til endamálið, ella seldar, fellur ognin /nettosøluprísurin til landskassan, og ger landsstýrið av, hvussu ognin/peningurin skal nýtast.

§ 3.

Tilskud kan ydes op til 40% af byggeomkostningerne eller af købspris og ombygningsudgifter.

§ 4.

Tilskudet ydes som rente- og afdragsfrit lån med pant i ejendommen indenfor 90% af værdien.

§ 5.

I driftstilskud kan ydes op til 50% af udgifterne til renter og afdrag af de oprindelige prioritetslån.

§ 6.

Tilskudet ydes til institutioner, som kun er oprettet med det formål at bygge (etablere) beskyttede boliger.

Institutionen skal være en selvejende institution og skal have vedtægter, der er godkendt af landsstyret.

Stk. 2. Benyttes den beskyttede bolig ikke længere til formålet eller bliver solgt, falder ejendommen/-nettosalgssummen til landskassen, og landsstyret afgør, hvorledes ejendommen/beløbet skal anvendes.

§ 7.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

§ 7.

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelse.

Viðmerkingar:

Avlamisfólk hava ikki ráð at byggja sær hús tá tey einans hava eina avlamispensión at liva av. Tey eru bundin til at leiga frá øðrum.

Við teimum prísum, sum eru galdandi í dag, verður teirra møguleiki fyri at leiga eina góða íbúð lítil, tí leiguupphæddin kann vera uppímóti tí upphædd, sum tey fáa í avlamispensión um mánaðan.

Hitt sama kann sigast um eldri fólk, sum skulu liva av fólkapensión.
Onnur norðanlond hava í mong ár bygt vardar íbúðir til hesar bólkar.

Vardar íbúðir eru sum oftast bygdar soleiðis, at fleiri eindir eru samanbygdar. Tær verða partvís nýttar til fólk, sum klára seg sjálvi, og partvís til fólk, sum mugu hava eina ávísa hjálp t.d. fáa heimahjálp, uttanífrá.

Ongar reglur hava verið um vardar íbúðir, men landsstýrið heldur at tørvur er á hesum í Føroyum í dag, sum bústaðarmøguleiki hjá avlamisfólki og gomlum.

Uppskotið er evnað til eftir galdandi lóg um bústaðarhús fyri fólk í útbúgving, løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983, broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 1988.

Kostnaður pr. íbúð verður ætlaður at vera 500.000,- kr. umframt grundøki.

Landsstýrið hugsar sær vardu íbúðirnar fíggjaðar við vanligum lánum úr Sparikassa- og Húsalánsgrunni og harafturat við einum

rentu- og avdráttarfríum láni úr landskassanum uppá 40% av byggikostnaðinum.

Harafturat kemur grundøkið, sum væntandi fæst ókeypis frá tí kommunu, har vardu íbúðirnar verða bygdar.

Landskassastudningurin til raksturin verður helvtin av útreiðslunum til rentur og avdrátt.

Eftir hjálagda uppskoti til fígging og rakstur av vardum íbúðum, verður leigan fyri hvørt búfólk 1.540,- kr. um mánaðan. Hjálagt fylgir møting yvir kostnaðin, fígging og rakstur av einum bústaðarhúsi fyri 6 fólk.

Dømi um fígging og ognar útreiðslur til 6 vardar íbúðir á 50m^2.

Grundøkið (ókeypis frá kommununi).....	320.000,- kr.
Byggikostnaður: 6 íbúðir á 500.000,- kr.....	3.000.000,- kr.
Samlaður kostnaður:.....	3.320.000,- kr.

Fígging:

Landskassastudningur 40%.....	1.328.000,- kr.
Sparikassin.....	836.000,- kr.
Húsalánsgrunnurin.....	836.000,- kr.
Grundøkið.....	320.000,- kr.
	3.320.000,- kr.

Ognarútreiðslur:

Sparikassin: avdráttur+rentur, annuitetslán:	111.048,-kr.pr.ár
Húsalánsg. el.likn. - - -	111.048,-kr.pr.ár
	222.096,-kr.pr.ár
Studningur 50%.....	111.048,-kr.pr.ár
Ognarútreiðslur árliga.....	111.048,-kr.pr.ár
Ognarútreiðslur um mánaðin.....	9.254,-kr.

Leiga um mánaðin fyri hvørja íbúð:..... 1.540,-kr.

Karolina Petersen
landsstýrismaður

/
/Klaus Hermann

Álit

frá

<u>løgtingsmáli nr. 1 /1988: løgtingslóg um vardar íbúðir.</u>

Málið er lagt fram av landsstýrinum 18. august 1988 og eftir 1. viðgerð 31. august 1988 beint frá almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og heldur, at hetta er ein gongd leið at hýsa avlamisfólki og eldri fólki og fólk annars, sum tørva at búgva í vardum umhvørvi.

Nevndin heldur tó, at tað er vert at skoyta uppí, at tað er reyndur lutur, at tað sjálvdan í longdini reynist væl at trunka fólk saman, ið hava somu trupulleikar ella somu veikleikar at stríðast við. Tað verður tí hildið vert at umhugsa, um ikki skipanin um vardar íbúðir kann samskipast við onnur sethúsprojekt, ið ikki virka sum vardar íbúðir. Eyvitað hevði ein slík verkætlan ført við sær ymiskar fíggingarháttir. T.d. hevði tað ikki verið av leið, um farast skuldi undir Berjabrekku í dag, at ætlanin um vardar íbúðir eftir hesi lóg vóru við í Berjabrekku verkætlanini.

Um bólkurin, ið henda lóg er tilætlað, verður nevnt í grein 1: Avlamisfólk og eldri fólk og fólk annars, sum tørva at búgva í vardum umhvørvi. Almanna- og heilsunevndin hugsar sær, at nevndu fólk annars eitt nú kunna vera stakir uppihaldarar við børnum.

Tað er ein samd almanna- og heilsunevnd, ið mælir løgtinginum til at taka undir við uppskotinu landsstýrisins.

ALMANNA- og HEILSUNEVNDIN, 6. september 1988.

Karin Kjølbro Jákup Lindenskov Adolf V. Hansen

Jógvan Sundstein Flemming Mikkelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11089 . Telex 81235 lingua fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag nakrar

9. august 1988.

F. L. j. nr. 1010-35
(at tilskrifa í svari)

KlH/3H

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 2/1988: Løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar.	Lagtingslov om særtillæg til visse pensionister.
§ 1. Serviðbót verður goldin avlamispensiónistum, fólkapensiónistum og einkjupensiónistum eftir reglunum í hesi lóg.	§ 1. Der udbetales særtillæg til invalidepensionister, folkepensionister og enkepensionister efter reglerne i denne lov.
§ 2. Serviðbót er munurin ímillum aðru megin pensión roknað út eftir reglunum í avlamispensiónslógini (Bekendtgørelse nr. 101 af 2. marts 1988 af Lov for Færøerne om invalidepension m.v.) og fólkapensiónslógini (Bekendtgørelse nr. 103 af 2. marts 1988 af Lov for	§ 2. Særtillæg udgør forskellen mellem på den ene side pension udregnet efter reglerne i invalidepensionsloven (Bekendtgørelse nr. 101 af 2. marts 1988 af Lov for Færøerne om invalidepension m.v.) og folkepensionsloven (Bekendtgørelse nr. 103 af 2. marts

Færøerne om folkepension og hinumegin pensión útroknað eftir
1) at 45.600 kr. koma í staðin fyri 9.900 kr. sum frádráttarfrí inntøka viðv. grundarupphæddina í § 4, 1. stk., í fólkapensiónslóginí og § 5, 1. stk., í avlamispensiónslóginí
2) at 72.500 kr. koma í staðin fyri 9.300 kr. sum frádráttarfri inntøka hjá hjúnum viðv. pensiónsviðbót í § 11, 2. stk., í fólkapensiónslóginí og § 12, 2. stk., í avlamispensiónslóginí
3) at 50.000 kr. koma í staðin fyri 6.400 kr. sum frádráttarfrí inntøka hjá støkum viðv. pensiónsviðbót í § 11, 2. stk., í fólkapensiónslóginí og § 12, 2. stk., í avlamispensiónslóginí.

1988 af Lov for Færøerne om folkepension) og på den anden side pension udregnet på den måde
1) at 45.600 kr. træder i stedet for 9.900 kr. som fradragsfri indtægt m.h.t. grundbeløb i folkepensionslovens § 4, stk. 1, og invalidepensionslovens § 5, stk. 1,
2) at 72.500 kr. træder i stedet for 9.300 kr. som fradragsfri indtægt for ægtepar m.h.t. pensionstillæg i folkepensionslovens § 11, stk. 2, og invalidepensionslovens § 12, stk. 2,
3) at 50.000 kr. træder i stedet for 6.400 kr. som fradragsfri indtægt for enlige m.h.t. pensionstillæg i folkepensionslovens § 11, stk. 2, og invalidepensionslovens § 12, stk. 2.

§ 3. Reglurnar í fólkapensiónslóginí og avlamispensiónslóginí hava við neyðugum tillagingum samsvarandi gildi fyri serviðbót.
2. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um serviðbót.

§ 3. Reglerne i folkepensionsloven og invalidepensionsloven finder med de fornødne tempelser tilsvarende anvendelse for særtillæg.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om særtillæg.

§ 4. Útreiðslurnar av ser-

§ 4. Udgifterne til særtil-

viðbót verða hildnar av landskassanum.

§ 5. Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1989.

læg afholdes af landskassen.

§ 5. Denne lov træder i kraft den 1. april 1989.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 132/1987 er samtykt, at landstýrið skal leggja uppskot fyri tingið, ið hevur til endamáls at tryggja fólka- og avlamispensiónistum eina størri tøka peningaupphædd, tá talan er um arbeiðsinntøku. Landsstýrið hevur hildið at hetta eigur at verða gjørt sum serviðbót til pensiónistar, sum er munurin millum grundarupphædd og pensiónsviðbót eftir hægri inntøkumørk.
Uppskotið fer at hava ávirkan fyri pensiónistar, sum hava inntøku aftrat pensiónini.
Sum lógin er í løtuni fyri fólka- og avlamispensión, missa pensiónistarnir burtur av pensiónsviðbót og hjúnarbandsviðbót- og fyri tey undir 67 ár eisini av grundupphædd - longu tá tey hava eina arbeiðsinntøku uppá 20.000,- kr. um árið.
Av hjáløgdu talvu sæst, at ein avlamispensiónistur, sum fortjenar 20.000,- kr., betalir 7.455,- kr. í skatti og missir 2.940,- av viðbótini, so av teimum 20.000,- kr., hevur hann 9.605,- kr. eftir (48% av arbeiðsinntøkuni).
Fortjenar hann 50.000,- kr., betalir hann 14.719,- kr. í skatti og missir 17.484,- kr. burtur av pensiónsviðbót og grundarupphædd, og verða tá 17.796,- kr. eftir av teimum 50.000,- kr. í arbeiðsinntøku (31%).
Tølini eru viðvíkjandi mittastu avlamispensión, sum er 5.483,- kr, sum fólk fáa, tá roknað verður við, at tey skulu vinna nakað aftrat rentuni. Vóru tey ikki før fyri tí, áttu tey at fingið hægstu pensión. Men hana fáa tey ikki, tí tey skulu royna at fortjena nakað sjálvi.
Og roynir nú pensiónisturin at fortjena aðrar 4.000,- um mánaðan afturat pensiónini, fær hann av hesari arbeiðsinntøku bert 1.483,- kr. pr. mór.

Ætlan Framsóknarflokksins var ikki at biðja danir gjalda meira av avlamis- og fólkapensión til Føroyar, fyri tað, um eldri og partvís avlamnir føroyingar ynskja at arbeiða t.d. hálva tíð á einum føroyskum flakavirki, fyri at fortjena afturat pensión-ini.
Ætlanin var heldur ikki at broyta skattin, sum aðrir hólkar í samfelagnum noyðast at boyggja seg fyri.
Tí verður skotið upp: at tær viðbøtur, sum pensiónistar missa eftir donsku lógini, kunnu verða afturgoldnar sum eitt før-oyskt ískoyti til pensiónina.
Tá uppskotið varð lagt fram í vár, fekk eg hjálagda yvirlit frá Almannastovuni yvir, hvat tað vil kosta, um allir pensión-istar vilja fortjena og brúka lógina. Talan er um ca. 3 mió. kr. um árið, sum er 13.750,- kr. pr. persón pr. ár.
Talan verður ikki einans um útreiðslur fyri landsstýrið, tá skattur má ætlast at vera umleið 25% av inntøkuni.
Inntøkumarkið fyri grundarupphæddina kemur fram við, at tølini í § 4/§ 5, sum eru 16.000 kr. (prístalsviðgjørd frá 9.900 kr.) verða løgd saman við tølunum í § 5/§6, sum eru 4.400 kr. (prístalsviðgjørd frá 2.680 kr.) Tað veruliga inntøkumarkið eftir uppskotinum verður sostatt (45.600 kr. + 4.400 kr. =) 50.000 kr. viðv. grundarupphædd.
Útreiðslan av uppskotinum - sum er landskassaútreiðsla burtur-av - hevur P/F Sam-Teld mett til 7.968.000 kr. árliga við útgjaldingini frá 1. mai 1988 sum grundarlag. Pensiónirnar eru frá 1. juni 1988 hækkaðir við o.u. 1,9% vegna prístalshækking og kann útreiðslan sostatt metast til o.u. 8.119.000 kr. ár-liga. Av tí at skotið er upp, at uppskotið fær gildi frá 1. apríl 1989, verður útreiðslan í 1989 o.u. 6.089.000 kr.
Neyðugt verður at seta tvey fólk til at umsita serviðbótina.

Karolina Petersen
landsstýrismaður

/
/ Klaus Hermann

Meirkostnaður av nýggjum lógaruppskoti.

Kelda:Útgjald av pensjónum mei 1988.

Tølini eru fyri mánaðan. Tølini í klombrum er tal av persónum, iá aftrat við nevndu veiting.

	Grundar-upphædd.	Pensjóns-viðbót.	Hjúnab. viðbót.	fa
Fólkapensjón.	100.746 (+8)	207.032 (+361)	5.541 (+22)	31
Fólkapensjón áðrenn tíð.	29.345 (+6)	4.248 (+8)	293 (+1)	3
Lægsta avlamispensjón.	20.245 (+14)			2
Miðal avlamispensjón.	129.951 (+16)	33.589 (+58)	3.855 (+10)	16
Hægsta avlamispensjón.	63.592 (+11)	24.316 (+20)	6.631 (+24)	9
Einkjupensjón.	26.971 (+8)	5.604 (+12)		3
Støk eftir undantaksreglu .	1.710	322 (+1)		
Tilsamans	372.560 (+63)	275.111 (+460)	16.320 (+57)	66

Tilsamans pr. ár 663.991 * 12 = 7.967.892,-

Meirkostnaður av lógaruppskoti, tá ið inntøkumarki fyri grundarupphædd og pensiónsviðbót verður sett til 50.000,00 kr.

Tølini, sum standa í klombrum, vísa, hvussu nógvar pensiónistar tað snýr seg um.

FÓLKAPENSIÓN

Fyri stak yvir 67 ár			+ 20.000 kr. í inntøku		+ 50.000 kr. í inntøku		+ 60.000 kr. í inntøku	
Fólkapensión pr. 1 jan. 1988	40.092,-		40.092,-		40.092,-		40.092,-	
Pensión viðbót	7.044,-		7.044,-	47.136,-	7.044,-		7.044,-	
	47.136,-	47.136,-	47.136,-		47.136,-	47.136,-	47.136,-	47.136,-
			+20.000,-	20.000,-	+50.000,-	+50.000,-	+60.000,-	+60.000,-
			67.136,-	67.136,-	97.136,-	97.136,-	107.136,-	107.136,-
Mist viðbót			+ 2.940,-	+ 2.940,-	+ 7.044,-	+ 7.044,-	+ 7.044,-	
Mist grundarupphædd			64.196,-		90.092,-		100.092,-	
Útrokningar av skatti:								
Løntakarafrádráttur: 20%, mest 8.400	+ 8.400,-		+ 8.400,-		+ 8.400,-		+ 8.400,-	
Skattaskyldug inntøka	38.736,-		55.796,-		81.692,-		91.692,-	
Kommunuskattur: 16%	6.197,16		8.927,36		13.070,72		14.670,72	
Landsskattur	8.271,36		12.996,76		21.024,52		24.124,52	
	14.469,12		21.924,12		34.095,24		38.795,24	
Persónfrádráttur/pensionistur	+12.000,-		+12.000,-		+12.000,-		+12.000,-	
Skattur	2.469,12	2.469,12	9.924,12	9.924,12	22.095,24	22.095,24	26.795,24	26.795,24
Fólkapensionin + skatt		44.666,88						
Fólkapensión + inntøka + viðbót + skatt				54.271,88		67.996,76		73.296,76
Meirskattur av inntøku				7.455,-		19.620,12		24.326,12
Meirvinningur av inntøku				9.605,-		23.329,88		28.629,88
- í % - -				48%		46,7%		47,7%

Yvirlit yvir skatt og mista pensiún av inntøku hjá avlamispensionisti:

	AVLAMISPENSIÓN					
Fyri støk við miðalpensión			+ 20.000 kr. í inntøku		+ 50.000 kr. í inntøku	
Grundarupphædd	40.092,-	40.092,-	40.092,-	40.092,-	40.092,-	40.092,-
Avlamisviðbót(skattafrí)		18.660,-		18.660,-		18.660,-
Pensiónsviðbót	7.044,-	7.044,-	7.044,-	7.044,-	7.044,-	7.044,-
	47.136,-	65.796,-	47.136,-	65.796,-	47.136,-	65.796,-
			+20.000,-	+20.000,-	+50.000,-	+50.000,-
			67.136,-	85.796,-	97.136,-	115.796,-
Mist av pensiónsviðbót			+ 2.940,-	+ 2.940,-	+ 7.044,-	+ 7.044,-
Mist av grundarupphædd			0.-		+10.440,-	+10.440,-
			64.196,-	82.856,-	79.652,-	98.312,-
Útrokningar av skatti:						
Løntakarafrádráttur: 20%, mest 8.400	+ 8.400,-		+ 8.400,-		+ 8.400,-	
Skattaskyldug inntøka	38.736,-		55.796,-		71.252,-	
Kommunuskattur: 16 %	6.197,76		8.927,36		11.400,32	
Landsskattur	8.271,36		12,996,76		17.788,12	
	14.469,12		21.924,12		29.188,14	
Persónfrádráttur/pensionistur	+12.000,-		+12.000,-		+12.000,-	
Skattur	2.469,12	2.469,12	9.924,12	9.924,12	17.188,14	17.188,14
Fólkapensionin + skatt		63.326,88				
Fólkapensión + inntøka + viðbót + skatt				72.931,88		81.123,86
Meirskattur av inntøku				7.455,-		14.719,02
Meirvinningur av inntøku - - í % - -				9.605,- 48%		17.796,98 31,6%

Yvirlit yvir skatt og mista pensión av inntøku hjá fólkapensionistum:

Fólkapensionistur undir 67 ár			+ 20.000 kr. í inntøku		+ 50.000 kr. í inntøku		+ 60.000 kr. í inntøku	
Fólkapensión 1. januar 1988	31.848,-	31.848,-	31.848,-	31.848,-	31.848,-	31.848,-	31.848,-	31.848,-
Pensiónsviðbót 1. januar 1988	5.496,-	5.496,-	5.496,-	5.496,-	5.496,-	5.496,-	5.496,-	5.496,-
	37.344,-	37.344,-	37.344,-	37.344,-	37.344,-	37.344,-	37.344,-	37.344,-
			+20.000,-	+20.000,-	+50.000,-	+50.000,-	+60.000,-	+60.000,-
			57.344,-	57.344,-	87.344,-	87.344,-	97.344,-	97.344,-
÷ mist viðbót			÷ 792,-	÷ 792,-	÷ 5.268,-		÷ 5.496,-	÷ 5.496,-
÷ mist grundarupphædd					÷17.940	÷23.208,-	÷23.940,-	÷23.940,-
			56.552,-	56.552,-	64.136,-	64.136,-	67.908,-	67.908,-
Útrokningar av skatti:								
Løntakarafrádráttur: 20%, mest 8.400	÷ 7.468,80		÷ 8.400,-		÷ 8.400,-		÷ 8.400,-	
Skattaskyldug inntøka	29.875,20		48.152,-		55.736,-		59.508,-	
Kommunuskattur: 16 %	4.780,03		7.704,32		8.917,76		9.521,28	
Landsskattur	5.975,04		10.719,52		12.978,16		14.147,48	
	10.755,07		18.423,84		21.895,92		23.668,76	
Persónfrádráttur/pensionistur	÷ 9.200,-		÷ 9.200,-		÷ 9.200,-		÷ 9.200,-	
Skattur	1.555,07	1.555,07	9.223,84	9.223,84	12.695,92	12.695,92	14.468,76	14.468,76
Fólkapensionin ÷ skatt		35.788,93						
Fólkapensión + inntøka ÷ viðbót ÷ skatt				47.328,16		51.440,08		53.439,24
Meirskattur av inntøku				7.668,77		11.140,85		12.913,69
Meirvinningur av inntøku				11.539,23		15.651,15		17.650,31
- í % - -				57,7%		31,3%		29,4%

Á l í t

í

løgtingsmáli nr. 2/1988: Løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við hugsjónunum um, at fólka- og avlamispensionistar hava størri peningsupphædd tøka, tá talan er um arbeiðsinntøku. Tað varð eisini samtykt í seinastu tingsetu, at landsstýrið skuldi leggja uppskot fram fyri tingið, ið hevði til endamáls at tryggja fólka- og avlamispensionistum størri peningsupphædd, tá talan var um arbeiðsinntøku. Sum lógin er í løtuni, missa fólka- og avlamispensiónistar burtur av pensiónsviðbót og hjúnabandsviðbót longu, tá tey hava eina arbeiðsinntøku upp á kr. 20.000 um árið.

Frá almannastovuni hevur nevndin fingið at vita, at sum støðan er í løtuni, kunnu 579 pensiónistar í størri og minni mun fáa gagn av teirri broyting, ið landsstýrið nú mælir til. Tað vil siga, talan er um 8,2% av øllum pensiónistum.

Frá almannastovuni hevur nevndin fingið at vita, at lógaruppskotið EDV/tekniskt er ógvuliga torført at hava við at gera, og at hetta førir við sær óneyðuga stóran kostnað í nýggjum programmum og í viðlíkahaldi. Eisini verður gjørt vart við, at henda broyting seinkar liðuggerð av programmi til pensións-, forsorgar- og dagpeningsskipanina har. Almannastovan hevur verið fyri stórum umleggingum í seinastuni, og er av teirri áskoðan, at stovnurin verður fyri álvarsligum bakkasti í einum sera viðbreknum tíðarskeiði, um henda skipan skal setast í verk 1. apríl 1989.

Frá almannastovuni verður m.a. víst á, at málið hevði verið munandi lættari at umsitið, um ein broyting varð gjørd í fólkapensiónslógini í staðin fyri. Landsumsitingin hevur tí

vent sær til socialministeriið um henda spurning. Svarið frá einum fulltrúa har hevur verið, at tað verður hildið ivasamt í verandi líki. Vanligt er, at tá slíkar broytingar skulu fara fram, at tær verða tiknar til viðgerðar í tí serligu donsku/-føroysku samráðingarnevndini. Hetta er sera trupult at avgreiða á henda hátt, tí nú fer tingið til hús og val verður.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Ásannandi omanfyristandandi kann meirilutin (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov, Aðolf V. Hansen) taka undir við uppskotinum.

Eisini verður lagt aftrat, at sami meiriluti er samdur um at seta soljóðandi ískoyti til uppskot landsstýrisins til 2. stk. í § 5: Lógin fer úr gildi, samstundis sum útgjaldingar sambært løgtingslóg nr. 71 frá 9. juni 1988 um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðarpensión byrjar.

Meirilutin setir nýggja § 5 í staðin fyri núverandi í uppskoti landsstýrisins, og setir samsvarandi hesum fram

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins.

§ 5. Henda lóg fær gildi 1. januar 1989 og fer úr gildi, tá útgjaldingarnar sbrt. løgtingslóg nr. 71 frá 9. juni 1988 um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðarpensión byrja.	§ 5. Denne lov træder i kraft 1. januar 1989 og træder ud af kraft, når udbetalingerne i henhold til nr. 71 af 9. juni 1988 om solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) vísir á uppskot fólkaflokksins í tingmáli nr. 36/1987 um, at fólka- og avlamispensiónin verður skattafrí. Hetta fer at muna nógv betur fyri

pensiónistarnar, eins og tað gagnar samfelagnum nógv meira.

Ein annar minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

Av tí, sum er ført fram av meirilutanum í Almanna- og heilsunevndini, er løgtingsmál nr. 2/1988: "Løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensiónistar als ikki búgvið at leggja fyri løgtingið."

Sami minniluti mælir tí løgtinginum til í staðin at samtykkja

U p p s k o t

til

løgtingslóg um endurgjald til fólkapensiónistar.

§ 1. Tann upphædd, sum fólkapensonistur missir í pensiónini orsakað av arbeiðsinntøku, verður goldin honum av landskassanum.

§ 2. Hendan skipan verður umsiting av Almannastovuni eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

§ 3. Henda lóg fær gildi 1. januar 1989.

lagtingslov om refusion til folkepensionister.

§ 1. Det beløb, en folkepensionists pension reduceres ned på grund af arbejdsindtægt, refunderes vedkommende af landskassens midler.

§ 2. Ordningen administreres af Almannastovan efter regler, som landsstyret fastsætter.

§ 3. Denne lov træder i kraft 1. januar 1989.

ALMANNA- og HEILSUNEVNDIN, 7. september 1988.

Karin Kjølbro Jákup Lindenskov Adolf V. Hansen

Jógvan Sundstein Flemming Mikkelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 17. august 1988 F. L. j. nr. 1010-5-1
(at tilvísa í svari)

Tlf. 11080. Telex 81235 tinges fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. Leygardag stongt

KlH/BH

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr.3/1988: Broytingar í almannalóggávuni.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri Fólkatingið hjáløgdu 2 uppskot til broytingar í almannalóggávuni.

Viðmerkingar:

Uppskotini fevna um tvey sløg av broytingum.

Fyrsta uppskotið er um tekniskar broytingar av tí orsøk, at danir hava "nullstillað" prístal teirra, sum føroysku pensiónirnar verða javnaðar eftir. Broytingarnar hava onga ávirkan á ta pensión, sum einstaki pensiónisturin fær. Broytingarnar hava ongar eykaútreiðslur við sær.

Annað uppskotið snýr seg um kærureglur.

Í løgtingsmáli nr. 122/1987 hevur løgtingið álagt landsstýrinum at skipa fyri, at kærunevnd verður sett í Føroyum viðv. ávísum avmarkaðum sløgum av almannaveitingum.

Í galdandi lóggávu er í hvørjum føri sær ásett, at landsstýrið er kærustovnur. Hetta kann so ikki verða broytt við avgerð eins av heimastýrinum.

Skotið verður tí upp at seta inn reglu um heimild hjá heimastýrinum at leggja til rættis kæruviðurskiftini, sum best verður hildið, uttan at ríkisstjórnin í framtíðini skal taka støðu til skapið av kæruskipan.

Umhugsað verður at samanseta kærunevndina soleiðis:
Dómari ella annar løgfrøðingur, tilnevndur av landsstýrinum,
Landslæknin, ella annar lækni, tilnevndur av landsstýrinum,
3 umboð vald av Føroya Løgting.
1 umboð fyri Meginfelag teirra brekaðu.

Karolina Petersen
landsstýrismaður -

/

/Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 3/1988: Lóg um broytingar í almannalóggávuni.

Málið er lagt fram av Føroya landsstýri hin 18. august 1988 og eftir 1. viðgerð 31. august 1988 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Tað er ein samd, sum tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

ALMANNA- og HEILSUNEVNDIN, 6. september 1988.

Karin Kjølbro Jákup Lindenskov Aðolf V. Hansen

Jógvan Sundstein Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 4/1968: Loysn av flogvallarspurningunum í Føroyum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um loysn av flogvallarspurningunum í Føroyum.

§ 1. Eingin størri útbygging av Vága floghavn verður gjørd, fyrrenn henda inngongur í eina samlaða meting um framtíðarflogvøll í Føroyum.

§ 2. Undirsjóvartunnilin, ið er partur av hesi útbygging, eigur at vera umfataður av hesi lóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

løgtingslov om løsning af Færøernes lufthavnsproblemer.

§ 1. Ingen større udbygning af Vagar lufthavn skal foretages, førend denne indgår i en samlet planlægning om fremtidslufthavn på Færøerne.

§ 2. Den undersøiske tunnel, som er en del af denne udbygning, bør også omfattes af denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Donsku flogferðslumyndugleikar fáast í løtuni við at meta um nøkur framtíð er í Vága Floghavn.

Roknast má vi, nú metast skal um framtíðar flogferðslu í Føroyum, at donsku myndugleikarnir eisini fara at taka aðrar flogvallarloysnir við í metingum teirra - eitt nú Glyvursnesætlanina.

Longu nú kann við rímuligari vissu sigast, at ein leingjan av vøllinum í Vágum er sera kostnaðarmikil, og at henda, sjálvt um hon verður framd, ikki bætir um tær avmarkingar, ið eru - kanska beint tvørtur ímóti.

Tá undirsjóvartunnilin kom fram, varð hesin ætlaður at vera eitt samferðslulið, sum í høvuðsheitinum skuldi knýta Vágarnar tættari at meginlandinum. Nú er hetta broytt, og undirsjóvartunnilin er nú í høvuðsheitinum tengdur at flogvallarmálinum og má tí eisini vera við í teim metingum, ið verða gjørdar um útbygging av Vága Floghavn.

Landsins fíggjarorka er avgjørt avmarkað, og nú sær út sum, at landsins myndugleikar ætla at tálma virksemunum. Sjálvt um ein kann halda, at langt er frá ætlan og til gerð her, so er ivaleyst rætt, at vit ongantíð ov skjótt taka hetta í rímasta álvara.

Rættast má tí vera, at eingin útbygging verður sett í verk, sum hevur samband við Vága Floghavn, fyrrenn stungið er út í kortið, og vissa er fingin fyri, at vit fáa sum mest burturúr teirri orku, vit hava.

Tilfarið, ið grundar undirsjóvartunnilin, bæði tekniskt og fíggjarligt, er spinkult, men saman við útbyggingini í Vágum, ið onkur vil fremja, so er hóast alt talan um íløgur fyri 500-600 milliónir.

Rætt er at prioritera flogvallarmálið fremri enn fast samband millum oyggjarnar, men so eigur eisini trygd at fáast fyri, at tann orka, ið er tøk, verður at nýta til hetta endamálið.

Tí má eisini vera rætt at steðga við at seta nakað í verk, fyrrenn samlaða metingin kemur frá teim serkønu, her eisini íroknað frá donsku flogferðslumyndugleikunum.

Á FØROYA LØGTINGI, 16. august 1988.

Poul Michelsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 4/1988: Loysn av flogvallarspurningunum í Føroyum.

Málið er lagt fram av Poul Michelsen, løgtingsmanni, 17. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í samferðslunevndina.

Nevndin vísir á, at áðrenn løgtingssetan varð endað í vár, var til viðgerðar løgtingsmál nr. 114/1987: Lán til tunnil um Vestmannasund, og varð hetta mál samtykt við 31-0. Havandi í huga ta stuttu tíð, ið fráliðin er, hevur nevndin onga orsøk til at halda, at støðan í nakran týðandi mun er broytt til hendan spurning, og er tí ógrundað at mæla til at steðga ætlanunum um nevnda tunnil. Heldur ikki metir nevndin tað vera rætt at steðga neyðugari útbygging av verandi flogvølli, so leingi støða ikki er tikin til at byggja annan flogvøll.

Nevndin setir sostatt eingi uppskot fram.

SAMFERÐSLUNEVNDIN, 6. september 1988.

Tórálvur Mohr Olsen — Asbjørn Joensen — Heini O. Heinesen

Adolf V. Hansen — Eyðun Viderø — Olaf Olsen

Johannes M. Olsen

Poul Michelsen
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 5/1988: Krøv til framtíðarflogvøll í Føroyum.

U p p s k o t

til

samtykt

Føroya Løgting samtykkir fyri at tryggja framtíðar flogsamband framyvir við útheimin, at FLOGVØLLUR FØROYA skal lúka ICAO sett krøv í "code 4" og "category I" bólkinum.

Best var, um vøllurin kann gerast 3.000 metrar langur, men hann má ikki vera styttri enn 2.200 metrar.

Viðmerkingar:

Eftir at fingið er til vega tilfar, ið rímuliga væl lýsir tørvin á flogsambandi føroyinga - bæði nú og í framtíðini, og eftir at sakkøn - bæði nú og í framtíðini, og eftir at sakkøn - bæði innanlendis og útlendis - hava sagt sína áskoðan - stendur greitt, at føroyska samfelagið rættiliga skjótt má fáa ein flogvøll, ið svarar til tey ynskir og krøv, brúkarin setir av einum framtíðar flogsambandi við útheimin.

Skuldi tað óhugsandi hent, at hædd ikki verður tikin fyri hesum, ber føroyska samfelagið kostnaðin av sera umfatandi avleiðingum, bæði so og so.

Ikki er dámligt at nema við trygdarviðurskiftini í sambandi við flúgving, men hetta er og má vera ein sera týðandi partur av eini flogvallarloysn. Veruleikin er ikki altíð líka tespiligur, men sjónsk tekin eru til, at líkasæla mótvegis alheims fyrisettum reglum, eiga rúmar ræsir, bæði hjá føroyskum

og donskum myndugleikum.

Flogvøllur Føroya skal tí lúka ICAO sett krøv og vera soleiðis útgjørdur og liggja soleiðis í lendi, at øll meðalstór vanlig flogfør við vanligari útbúnaðari manning kunnu lenda. Føroyska samfelagið verður tá samanbundið við alheims flogferðslunetið við teim fyrimunum, ið hetta náttúrligt hevur við sær og ikki sum í dag, har serútgerð og ser- og fráviksloyvir er grundin undir allari Føroyaflúgving.

Fíggjarligu avleiðingarnar eru eisini hareftir, og í dag ber til at útrokna hesar. Skelkandi tøl, tí fyri samfelagið snýr hetta seg um 50-100 milj. kr. árliga, og fyri brúkarin merkir hetta, at hann má gjalda 6-700 kr. ov nógv fyri hvønn einvegis ferðaseðil.

Sum frálíður - tá ferðafólkatalið er komið upp á 200 túsund, og góðsflutningurin byrjar av álvara - gerast fíggjarligu avleiðingarnar so ramar, at samfelagið ikki kann bera hesar.

Irregularitetur og flutningskostnaður til og frá flogvøllinum, liggja aftan fyri útrokningarnar. Ótrælsa kappingin, tíðarmissur og íløgukostnaður, er tá ikki tikin við, men sjálsagt liggja eisini hesi tøl, ið tala fyri nýggju floghavn føroyinga.

Ein "CODU 4" og "CATEGORI I" flogvøllur, er tí minsta krav, ið setast kann. Serkønir meta, at minsta flogbreytalongd talan kann verða um, er 2200 metrar, men helst eigur møguleiki at vera fyri at leingja hesa, tó kann ein longd upp á 1800 metrar nøkta tørvin tey fyrstu árini.

Slíkur vøllur í cat. I (instrumentflúgving), økir munandi um trygdina í sambandi við fráferð og komu til vøllin - bæði á ein og annan hátt.

Tekniska stuðulsskipanin, saman við valdu flogvallarloysn, ger flogferðsluna meira álítandi og reguliga, har veður og vindur ikki hava ta stóru ávirkanina. Opnað verður fyri nýggjum brúksmøguleikum, og góða búskaparliga árinið er sjónligt.

Harmiligt er at ásanna, at landsins myndugleikar ikki vilja siggja í eyguni, tær avmarkingar í verandi flogføllur hevur, og altíð vil hava, men heldur eru sinnaðir at lata ótolandi avleiðingarnar ganga út yvir brúkarin, og harvið samfelagið alt. Tí er neyðugt neyðugt við hesi samtykt, og at boða donsku mynd-

ugleikunum frá hesari.

Alt bendir á, at danskir myndugleikar í dag eru fegnir um at fáa henda møguleika og soleiðis sleppa burtur úr tí, teir eru við at koyra seg fastar í í Vágum.

Á FØROYA LØGTINGI, 16. august 1988.

Poul Michelsen

F e l a g s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 5/1988: Krøv til framtíðarflogvøll í Føroyum.
og løgtingsmál nr. 23/1988: Metingar í samband við bygging av nýggjum flogvølli í Føroyum.

Løgtingsmál nr. 5/1988: Krøv til framtíðarflogvøll í Føroyum er lagt fram av Poul Michelsen 17 august 1988 og eftir 1. viðgerð tann 2. september 1988 beint í samferðslunevndina.

Løgtingsmál nr. 23/1988: Metingar í samband við bygging av nýggjum flogvølli í Føroyum var lagt fram av løgtingsmonnunum Jógvan I. Olsen og Johs. M. Olsen 2. september 1988, og eftir 1. viðgerð sama dag beint í samferðslunevndina.

Í samferðslunevndini hevur verið til viðgerðar tingmál nr. 21/1986: Uppskot til samtyktar viðvíkjandi flogvallarviðurskiftunum. Undir viðgerðini av hesum máli hevur samferðslunevndin biðið um upplýsingar og sett Statens Luftfartsdirektorat spurningar um leinging av flogbreytini í Vágum og aðrar flogtekniskar spurningar. Sum tað framgongur av viðløgdu skjølum dagf. 3. mars 1988, hevur samferðslunevndin rykt eftir svari.

Í svarskrivi 15. mars 1988 hevur Trafikministeriet boðað frá, at svar kann væntast umleið 1. september 1988.

Samferðslunevndin ásannar, at talan er um sera umfatandi mál og við tí í huga, at váttan fyriliggur um at neyðugt og haldgott tilfar um málið er á veg, verður mett, at so skjótt umrødda tilfar er komið fram, er tað beint, at málið verður tikið upp aftur og at ein faklig og óheft nevnd verður skipað, ið kann viðgera málið. Vísast má eisini á, at samfelagsviðurskiftini í stóran mun eru broytt í tí tíðini, umrøddu spurningar hava verið til viðgerðar.

Ein sand samferðslunevnd setir sostatt fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta eina fakliga og óhefta nevnd at kanna øll viðurskifti viðvíkjandi framtíðarflogferðslu.

Nevndin skal verða liður við arbeiði sítt og gera tilmæli í seinasta lagi 1. oktober 1989.

SAMFERÐSLUNEVNDIN. 6. september 1988.

Tórálvur Mohr Olsen Asbjørn Joensen Heini O. Heinesen

Adolf V. Hanson Eyðun Viderø Olaf Olsen

Johannes M. Olsen

- 3 skjøl.

FØROYA LØGTING

FR-110 Tórshavn,

tann 10. december 1987.

j. nr.
(at tilskrive ved svar)

Áarvegur 1. Box 308. Tlf. (298)-18850. Telefax (298)-18626
Arbejdstid: kl. 10-15. Sygeværelse straks!

Samferðslunevndin
(Trafikudvalget)



Ministeriet for offentlige arbejder
Frederiksholms Kanal 27
1220 København K.

Lagtinget har vedtaget, at trafikudvalget skal tage op til behandling spergsmålene omkring lufthavnsforholdene på Færøerne.

Udvalgets overordnede spørgsmål er, om der er behov for en længere startbane end den nuværende på Vágar.

Under behandlingen har udvalget bl.a. haft drøftelser med brugere af den eksisterende lufthavn.

I forbindelse med det overordnede spørgsmål vil man gerne have besvaret nedennævnte spørgsmål, som ministeriet venligst anmodes om at være behjælpelig med at få besvaret hos de kompetente myndigheder.

Spørgsmål 1.
Om der er forbundet nogle fysiske og/eller opreationelle hindringer ved en forlængelse af landingsbanen på Vágar?

Spørgsmål 2.
I givet fald ønskes en begrundet redegørelse med angivelse af, hvilke hindringer en forlængelse medfører og på hvilke stadier i et forlængelsesforløb disse indtræder?

FØROYA LØGTING

Spørgsmål 3.
Der bedes angivet, hvorvidt eventuelle hindringer vil indtræde på grund af fastsatte ICAO-normer eller nationale-normer?

Spørgsmål 4.
Der ønskes angivet, hvorvidt den anvendte flytype har indflydelse på mulige hindringer, og såfremt dette er tilfældet, ønskes besvaret, hvorledes især følgende tre flytyper begrænses: 1) Fokker Friendship 27, 2) British Aerospace 146-200 og 3) Boeing 737-200?

Spørgsmål 5.
Endelig ønskes en redegørelse for udgifterne ved en banaforlængelse på Vágar.

Det forudsættes, at en eventuel forlængelse skal medføre mindst mulige miljøgener, og at de sikkerhedsmæssige krav opretholdes.

Man er opmærksom på, at en forlængelse kan have uens indflydelse på henholdsvis start- og landingsmulighederne. I så fald ønskes der nærmere redegjort for disse forhold.

Udvalget er opmærksom på, at der senere kan være behov for at stille flere spørgsmål, hvorfor man tager forbehold for at supplere spørgsmålene, eventuelt ved mundtlig forhandling.

Med venlig hilsen

Tórdur J. Niclasen
formand for trafikudvalget

K. Thomasen
kontorchef

FØROYA LØGTING
Samferðslunevndin
(Trafikudvalget)

FR-110 Tórshavn.

dann 3. mars 1988.

j. nr.
(at tilhalla í svari)

Áarvegur 1, Box 284, Tlf. (298)-14450, Telefax (298)-14454
Afgreiðslutíð: kl. 10-15, leygardag stongt

KT/EB

Trafikministeriet
7 MAR 1988
Trafikministeriet

Ministeriet for offentlige arbejder
Frederiksholms Kanal 27
1220 København K.

Idet jeg henviser til trafikudvalgets brev af 10. december 1987 vedrørende en anmodning om at få besvaret nogle spørgsmål vedrørende mulighederne for at forlænge startbanen i Vágar lufthavn, skal jeg i forbindelse med trafikudvalgets videre behandling af spørgsmålet herved tillade mig at spørge ministeriet, om man har foranstaltet undersøgelsen igangsat og i givet fald, hvornår den kan forventes afsluttet.

Det vil naturligvis have trafikudvalgets interesse at blive bekendtgjort med eventuelle delresultater.

Med venlig hilsen

Tórður J. Niclasen
formand for trafikudvalget

/ K. Thomasen
kontorchef

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TIf. 11010 . Telex 81235 fingma fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag nógv

17. august 1988

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 508-3

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr.6/1988: Veiting av ríkisborgararætti.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 157 frá 23. mars 1988 um veiting av ríkisborgararætti, verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevnda lóg verður lýst at galda í Føroyum.

Eftir lógini verður eisini veittur 5 persónum, búsitandi í Føroyum, ríkisborgararættur.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Vilhelm Johannesen
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 6/1988: Veiting av ríkisborgararætti.

Málið er lagt fram av landsstýrinum 18. august 1988 og eftir 1. viðgerð 31. august 1988 beint í rættarnevndina.

Skotið verður upp, at løgtingið samtykkir, at lóg nr. 157 frá 23. mars 1988 um veiting av ríkisborgararætti, verður lýst at galda í Føroyum.

Lógin ber m.a. í sær, at veittur verður 5 persónum, búsitandi í Føroyum ríkisborgararættur.

Rættarnevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

RÆTTARNEVNDIN, 5. september 1988.

Ingrið Sondum Jóannes Dalsgaard Jákup Lindenskov

Jógvan Sundstein Zilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81225 lingm fo . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag uttan

23. august 1988

F. L. j. nr. 2-6

AMD/PP

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 7/1988: Lov om bekendtgørelse af love, bekendtgørelser og anordninger på Færøerne.

U p p s k o t

til

s a m t y k t a r

Løgtingið góðkennir viðlagda uppskot til "Lov om kundgørelse af love, bekendtgørelser og anordninger på Færøerne"

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 109 frá 17. februar 1987 um alment kunngerðarblað § 7 er landsstýrinum heimilað eftir avtalu við ríkisstýrið ella ríkismyndugleikar og aðrar myndugleikar, at upptaka lógir, kunngerðir, lýsingar o.t. í almenna kunngerðarblaðið, sum landsstýrið skal útgeva frá 1. oktober 1988.

Landsstýrið hevur hjá ríkismyndugleikunum spurt, um áhugi er fyri at lýsa í almenna kunngerðarblaðnum, og hevur løgmálaráðið mett, at nú kunngerðarblaðið kemur, verður best at avtaka lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 um "Kundgørelse af Love og Anordninger på Færøerne", og at lagt verður fyri fólkatingið hjálagda uppskot til lóg. Eftir uppskotinum verður lýsing í Kunngerðarblaðnum neyðug fyri at lógir, kunngerðir ella fyriskipanir fáa gildi fyri Føroyar.

Lýsast skal í heilum teksti, tó kann viðkomandi ráðharri gera undantak frá hesum, soleiðis at avmarkað verður til heiti og dagfesting fyri undirskrift.

Eisini verður sagt í uppskotinum, at kunngerðir og fyriskipanir, ið eru undantiknar frá lýsing í Lovtidende, ikki skulu kunngerast í Kunngerðarblaðnum.

Viðvíkjandi spurningunum um, nær lógir o.a. fáa gildi, verða føroysku reglurnar fylgdar.

Lógin er ætlað at koma í gildi frá 1. januar 1989.

Vilhelm Johannesen
landsstýrismaður

/
/Jalgrím Hilduberg

ij 201/14
JUSTITSMINISTERIET

L.A. 1987-522-63.
Den 5. april 1988.

Forslag
til
Lov om kundgørelse af love, bekendtgørelser og anordninger på Færøerne.

§ 1. Love, bekendtgørelser og anordninger, der gælder for Færøerne, kundgøres i Landsstyrets kundgørelsestidende for Færøerne, (Kunngerdabladid).
Stk. 2. Bekendtgørelser og anordninger, der er undtaget fra kundgørelse i Lovtidende, skal ikke kundgøres i Kunngerdabladid.
Stk. 3. Vedkommende minister kan bestemme, at en lov, bekendtgørelse eller anordning ikke kundgøres med den fulde ordlyd. Kundgørelsen kan begrænses til titel og underskriftsdato.

§ 2. Love, bekendtgørelser og anordninger træder i kraft på Færøerne ugedagen efter kundgørelsen, medmindre loven, bekendtgørelsen eller anordningen bestemmer andet.

§ 3. Loven træder i kraft den 1. januar 1989.
Stk. 2. Lov nr. 51 af 1. april 1896 om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne ophæves.

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 7/1988: "Lov om bekendtgørelse af love, bekendtgørelser og anordninger på Færøerne."

Málið er lagt fram av landsstýrinum 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint á rættarnevndina.

Uppskotið mælir til, at uppskot til "Lov om kundgørelse af love, bekendtgørelser og anordninger på Færøerne" verður at samtykkja av Føroya løgtingi.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Harumframt setir ein meiriluti (Ingrið Sondum, Jóannes Dalsgaard og Jógvan Sundstein) fylgjandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at fólkatingslógir, ið settar verða í gildi í Føroyum, eisini verða kunngjørdar í heilum líki á føroyskum máli í Kunngerðablaðnum.

RÆTTARNEVNDIN, 5. september 1988.

Ingrið Sondum Jóannes Dalsgaard Jákup Lindenskov

Jógvan Sundstein Eilif Samuelsen

Poul Michelsen
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 8/1988: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassar.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður § 5 orðað soleiðis:

"Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 8 til 15 í sama lóg, og teirra í § 2 nevndu feløgum v.m., sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, ásettur til 49% av inntøkunum til landskassa og kommunur. Skatturin verður býttur við 38% sum kommunuskattur og 62% sum landsskattur."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 fra 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer affattes § 5 således:

"Under henvisning til § 54 i kildeskatteloven udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lov § 1, nr. 8 til 15 og for de i § 2 nævnte selskaber m.v., der er undergivet begrænset skattepligt, til 49% af indtægten til landskasse og kommune. Skatten fordeles med 38% som kommuneskat og 62% som landsskat."

§ 2.

Henda lóg fær gildi fyri skattir, sum verða líknaðir á inntøkur í tí roknskaparárinum, sum endar í álmanakkaárinum 1988 ella seinni.

§ 2.

Denne lov træder i kraft for skatter, som pålignes på indtægter i det regnskabsår, som slutter i kalenderåret 1988 eller senere.

Viðmerkingar:

Málið varð framlagt 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 beint í skattanevndina.

Skattanevndin viðgjørdi málið og varð tikið undir við uppskotinum við teirri broyting, at býtið av skattinum, sum eftir táverandi uppskoti var 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur, skuldi broytast til ávikavist 38% til kommunurnar og 62% til landskassan.

Av einihvørji orsøk varð málið ikki avgreitt aftur til løgtingið og fall sostatt burtur.

Tískil verður uppskotið sett framaftur við teirri broyting í procentlutfallinum millum kommunurnar og landskassan sum tilskilað er omanfyri. Vist verður annars til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 97/1987: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Á FØROYA LØGTINGI, 17. august 1988.

Poul Michelsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 8/1988: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Málið er lagt fram av Poul Michelsen, løgtingsmanni, tann 17. august 1988 og eftir 1. viðgerð 31. august beint í skattanevndina.

Skattanevndin tekur til eftirtektar, at fyriliggjandi lógaruppskot er samsvarandi løgtingsmál við sama heiti sum 17. mars 1988 varð framlagt og eftir 1. viðgerð 7. apríl 1988 varð beint í skattanevndina.

Skattanevndin viðgjørdi tá málið og varð tá tikið undir við uppskotinum við teirri broyting, at býtið av skattinum, sum eftir táverandi uppskoti var 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur, skuldi broytast til ávikavist til 38% til kommunurnar og 62% til landskassan.

Av einihvørji orsøk kom málið ikki aftur til løgtingið og fall burtur.

Ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi lógaruppskot.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

KRISTILIGI FOLKAFLOKKURIN
Føroya Framburðs-og fiskivinnuflokkur

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 9 /1988: Afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla.

U P P S K O T

til

samtyktar

Alagt verður landsstýrinum at fyri eitt at taka aftur suspenderingina av skúlastjóranum við Vágs skúla.

Viðmerkingar:

Í september 1985 samtykti Føroya landsstýri at seta í verk tænastumannakanning móti skúlastjóranum og 13 lærarum við Vágs skúla.

Henda politiska avgerð varð tikin, hóast Landsskúlaráðið ikki metti grundarlag at vera fyri slíkari kanning og hóast at skúlanevndin við Vágs skúla ikki kærdi avgerð landsskúlaráðsins.

Allan Mølke Hansen, dómarafulltrúi varð útnevndur sum forhoyrsleiðari 7. okt. 1985.

Avhoyringarnar av skúlastjóranum og teim 13 lærarunum byrjaði fyrst 21. apríl 1987. Hetta orsakað av, at avvarðandi myndugleiki ikki hevði fylgt framferðarhátti í galdandi tænastumannalóg.

Teir politisku myndugleikarnir hava eisini støðugt blanda seg og lagt trýst á forhoyrsleiðaran meðan kanningin er farin fram.

Avhoyringarnar vórðu loknar nú í vár og er sostatt komið upp undir land við umtalaðu tænastumannakanning.

Nú - beint áðrenn úrslitið av kanningini fyriliggur - tekur landsstýrið á fundi 27.07.1988 avgerð um at suspendera eitt av teim 14, ið kanningin umfatar, nevnliga skúlastjóran sjálvan.

Henda politiska avgerð, sum nú er tikin, má metast bæði ósaklig og ógrundað - ikki minst tá hugsað verður um, at skúlastjórin undir nevndu truplu umstøðum hevur megnað at rikið skúlan hesi trý árini uttan at fingur kann setast á nakað!

Av sakkunnleika verður málinu mott, at avgerð landsstýrsins beinleiðis er ólóglig.

Óneyðugt skuldi verið at komi í tingi við uppskoti sum hesum, men tá hugsað verður um, hvussu leikur er farin fram í hesum máli, so verður hetta gjørt í vónini um at meiriluti fæst her á tingi fyri at fáa í rættlag avgerð, sum frá lógfrøðisligum sjónarmiði verður søgd at vera einum rættarsamfelag óverdug.

Á FØROYA LØGTINGI , 18. august 1988

Tordur J. Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 16. august 1988

F. L. j. nr. 430-12-45-16
(at tilskila í svari)

Tlf. 11080, Telex 81235 flogst fa., Telefax 14942, Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

JK/PP

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 10/1987: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður sum 3. stk. í § 154 sett:

1) Hevur persónur, sum er skattskyldugur eftir § 1 í hesi lóg, fingið løn fyri tænastu umborð á einum donskum skipi, ið er skrásett í donsku altjóða skipaskráseting-ini, lækkar samlaði inntøkuskattur hansara við tí upphædd, sum lutfalsliga fellur á hesa lønarinntøku.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om landsskatt og kommuneskatt.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 fra 1. september 1983 om landsskatt og kommuneskatt med senere ændringer tilføjes som 3. stk. i § 154:

1) Har en person, der er skattepligtig efter § 1 i denne lov, erhvervet lønindkomst ved tjeneste om bord på et dansk skib, der er indregistreret i Dansk Internationalt Skibsregister, nedsættes den samlede indkomstskatt med det beløb, der forholdsmæssigt falder på denne lønindkomst.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi 20. august 1988.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 20. august 1988.

Viðmerkingar:

Danska fólkatingið hevur í juni 1988 viðtikið at seta úr gildi lóg um sjómansskatt. Tíðin hevur gjørt tað neyðugt at umskipa skattleggingi av sjómonnum. Hetta hevur ført við sær, at samstundis sum lógin um sjómansskatt varð avtikin, komu reglur um sjómansskatt sum uppískoyti til skattalógir, sum annars eru galdandi fyri persónar skattskyldugir í Danmark.

Millum Føroyar og Danmark hevur leingi verið ein serstøk sjómanskattaskipan, sum hevur virkað á tann hátt, at føroyingar við donskum skipum, tá ið teir hava verið búsettir í Føroyum, hava verið undir fullari skattskyldu í Føroyum. Donsku myndugleikar yvirførdu tann skatt, sum var uppkravdur í Danmark av inntøku teirra við donskum skipum, til føroyskar skattamyndugleikar.

Broytingin í Danmark í juni í ár hevur við sær, at skiljast má nú í Føroyum millum:

1) Sjómenn sum sigla við skipum undir vanligu donsku skipaskrásetingini og
2) Sjómenn sum sigla við skipum, skrásettum í donsku altjóða skipaskrásetingini.

ad 1) Hesir sjómenn koma undir avmarkaða skattskyldu í Danmark, verða skattaðir við 30% av bruttolønini, og hesin skattur verður síðani yvirførdur til landskassan í Føroyum.

ad 2) Hesir sjómenn koma eisini undir avmarkaða skattskyldu í Danmark, verða prinsipielt skattaðir við 30% av bruttolønini, men vegna teir lønarsáttmálar, sum hesir sjómenn eru undir í Danmark, er nú í Danmark heimild fyri vegna altjóða kapping, at frítaka teir fyri at gjalda skatt av hesi inntøku í Danmark.

Tann lønin, sum hesir sjómenn fáa útgoldnað er ein sokallað "nettoløn", og fyri at líkastilla allar sjómenn við donskum skipum er neyðugt við einari lógarbroyting í okkara skattalóg, sum førir við sær, at skattur av "nettolønini", sum er fingin við donskum skipum undir donsku altjóða skipaskrásetingini verður lækkaður, við tí upphædd, sum skuldi verða roknaður av hesi "nettoløn".

Bæði sjómenn við vanligum donskum skipum, og donskum skipum undir altjóða skipaskrásetingini eru undir fullari skattskyldu í Føroyum. Hetta lógaruppskot førir við sær, at eingin munur verður í teirra búskaparligu støðu í Føroyum.

-

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/

/Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 10/1988: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í skattanevndina.

Ein samd skattanevnd mælir til at samtykkja uppskoti landsstýrisins.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 18. august 1988

F. L. j. nr. 400-41
(at tilskrive i svaret)

Tlf. 11080 . Telex 81135 tingas fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Aagreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

KH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 11/1988: Eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnu.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnu.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veita ráfiskagrunninum neyðugan pening, til tess at avreiðingarprísurin hækkar upp til 5% við gildi frá 1. juni 1988. Eisini verður landsstýrinum heimilað at økja játtanina til aðrar grunnar og nevndir, hvørs endamál eru at minka um veiðutrýstið á landleiðini, stuðla veiðihættum, ið minka um orkuna í botnfiskaveiðuni undir Føroyum, hækka um virkingarstigið og økja um útflutningsvirðið.

Lagtingslov om ekstrabevilling til fonde og udvalg vedrørende fiskerierhvervet.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegna at yde Råfiskefonden nødvendige beløb med det formål at indhandlingsprisen forhøjes med op til 5% med gyldighed fra 1. juni 1988. Endvidere bemyndiges landsstyret til at forøge bevillinger til andre fonde og udvalg, hvis formål det er at formindske fangstpresset på fiskeriterritoriet, støtte fangstmetoder, der formindsker kapaciteten i bundfiskeriet under Færøerne, forhøjer bearbejdelsesgraden og øger eksportværdien.

Upphæddirnar verða:
Økt játtan
Ráfiskagrunnurin 40 mió. kr.
Økt játtan til-
taksgrunnurin hjá
Ráfiskagrunninum 35 mió. kr.
Økt játtan
til minstuløn og
annan stuðul til fiskivinnuna
annars 25 mió. kr.

§ 2. Peningurin verður at gjalda av avlopi landskassans í 1987.

§ 3. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at læna upp til 30 mió. kr. til upphøggingargrunnin. Hesin peningur kann lænast úr oljugrunninum.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 94 frá 14. juli 1988 um eykajáttan til grunnar v.m.

Beløbene bliver:
Forhøjet bevilling
Råfiskefonden 40 mio. kr.
Forhøjet be-
villing Råfiske-
fondens reserve-
fond 35 mio. kr.
Forhøjet bevilling
mindsteløn og
anden støtte til fiskerier-
hvervet
iøvrigt 25 mio. kr.

§ 2. Pengene udbetales af landskassens overskud i 1987.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at låne op til 30 mio. kr. til kondemneringsfonden. Dette beløb kan lånes af oliefonden.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelse og samtidig træder ud af kraft lagtingslov nr. 54 af 14. juli 1988 om ekstra bevillinger til fonde m.m.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 94 fra 14. juli 1988 varð ásett, at landsstýrið skuldi leggja fyri løgtingið á ólavsøku 1988 serliga løgtingslóg, sum ásetti tá peningaupphæddina, sum er neyðug fyri at avreiðingarprísurin á ráfiski hækkar við 5% við gildi frá 1. juni 1988.

Landsstýrið hevur út frá fyriliggjandi tilfari mett, at neyðuga upphæddin er 100 mió. kr. og skjýtur upp, at henda

upphædd verður býtt við 40 mió. kr. beinleiðis til Ráfiskagrunnin, 35 mió. kr. í tiltakagrunnin hjá Ráfiskagrunninum og 25 mió. kr. eyka á konto á fíggjarlógini minstuløn og annar stuðul til fiskivinnuna í 1988. Hesar 25 mió. kr. eru fyri at leggja út fyri viðurskifti, sum tað ikki við vissu ber til at meta um, serliga viðvíkjandi søluviðurskiftum, valutaviðurskiftum o.ø.

Annars verður víst til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 147/1987.

Atli P. Dam
løgmaður

/

/Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 11/1988: Eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnuni.

Málið er lagt fram av landsstýrinum 18. august 1988 og eftir 1. viðgerð 31. august 1988 beint í fíggjarnevndina.

Undir 1. viðgerð varð víst á, at orðingin í § 2 í uppskotið landstýrisins eigur at verða broytt soleiðis, at í staðin fyri, at sagt verður at peningurin verður at gjalda av avlopið landskassans í 1987 eigur at verða sett: peningurin verður at taka úr landskassanum og/ella úr oljugrunninum.

Undir viðgerðini varð talað við tvey umboð fyri ráfiskagrunnin, nevniliga formannin Bjarna Vilhelm og nevndarlimin Óla Jacobsen, um spurningar í tilknýti til fyriligjandi játtan og peningatørv hjá Ráfiskagrunninum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) er varðigur við ta óvissu í altið er tá ið talan er um veiði, prís og avreiðingarvirðir, og kann ti taka undir við uppskotinum og mælir løgtingimum til at samtykja uppskot landstyrisins við áðurnevndi broyting, og setir fram tí fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landstýrisin:
Grein 2 verður orðað soleiðis:

§ 2. Peningurin verður at taka úr landskassanum og/ella úr oljugrunninum.	§ 2. Pengene udbetales af landskassen og/eller af cliefonden.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) førir fram: Eftir at henda samgongan nú í skjótt 4 ár hesur umsitið fiskivinnu okkara í landsstýrinum má viðgangast, at okkara høvuðsvinna er so illa fyri, at stór hjálp er bráðneyðug.

Sambandsflokkurin hevur í hesum tíðarskeiðið ferð eftir ferð vist á hesa skeivu gongd við at leggja uppskot fyri tingi um broytingar betra vegin. Tíverri hava hesi uppskot okkara ikki fingið undirtøku í løgtinginum.

Í fyriliggjandi uppskoti verður játtað fiskiviunnuni 100 mió kr., ið verða býttar soleiðis, at Ráfiskagrunnurin fær 40 mió. kr., triltaksgrunnurin 35 mio. kr., tilsamans 75 mió. kr., meðan 25 mió. kr. verða til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna annars.

Umboð fyri Ráfiskagrunnin hava undir viðgerðini av málinum gjørt eina meting av tørvinum hjá Ráfiskagrunninum hetta árið út, við galdandi avreiðingarprísum og óbroyttum marknaðarviðurskiftum.

Nýtslan fram til 1. september er	130 mio. kr.
Ætlað nýtsla fram til 1. januar er	78 mió. kr.
Ætlað samlað nýtsla fyri 1988	208 mió. kr.

Játtanir á fíggjarlógini fyri 1988 er 55 mió. kr., og í tiltaksgrunnin vóru 31 mió. kr., tilsamans 86 mió. kr. Hetta merkir, at við tømdum tiltaksgrunni er tørvurin hjá Ráfiskagrunninum fyri at halda verðandi prisir uml. 122 mió. kr.

Í uppskotinum verða játtaðar grunninum 75 mió. kr. og merkir hetta sostatt, at grunninum tørvar í minsta lagi 47 mió. kr. afturat og setir minnilutin fram broytingaruppskot til § 1, har 40 mió. kr. verða broyttar til 87 mió. kr. og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landstyrisins:

Í § 1 verða "40 mió. kr." broyttar til: "87 mió. kr."	I § 1 ændres "40 mio. kr." til : "87 mio. kr.".

Minnilutir (Poul Michelsen) tekur undir við uppskotið landsstýrisins, men vísir til uppskot frá fólkaflokkinum nr. 147/1987 (eykatingseta) "Lóg um endurrindan til fiski-vinnuna".

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988

Jørgen Thomsen | Asbjørn Joensen | Signar Hansen

Adolf V. Hansen | Ivan Johannesen | Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen

Løgtingsmál nr. 12/1988

Fíggjarløgtingslóg 1989

Uppskot til
fíggjarløgtingslóg
fyri
árið 1. januar – 31. december 1989

Forslag til
finanslagtingslov
for
året 1. januar – 31. december 1989

Yvirlit yvir rakstrarætlan fyri fíggjarárið 1989

Oversigt over driftsbudgettet for finansaret 1989

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 1.	Skattur Skatter	1.180.000.000	
§ 2.	Toll- og framleiðslugjøld Told- og produktionsafgifter	1.208.000.000	
§ 3.	Onnur gjøld Andre afgifter	12.430	
§ 4.	Inntøkur av spæli Indtægter ved spil	1.200.000	
§ 5.	Rentur og vinningsbýti v.m. Renter og udbytte m.v.	3.000.000	
§ 6.	Landsstovnar Landsvirksomheder		-43.359.000
§ 7.	Partur av avlopi danska tjóðbankans Andel i den danske Nationalbanks overskud	15.000.000	
§ 8.	Gjaldingar frá danska statinum Betalinger fra den danske stat	731.066.000	
§ 9.	Ymsar inntøkur Diverse indtægter	5.000	
			42.357.000
	Nettoinntøka/Nettoindtægt		3.008.342.000
		3.050.701.000	3.050.701.000

		Útreiðslur Udgifter kr.
§ 10.	Løgtingið Lagtinget	15.394.000
§ 11.	Landsumsitingin Landsadministrationen	162.915.000
§ 12.	Heilsumál Sundhedsvæsenet	414.203.000
§ 13.	Samferðslumál Kommunikationsvæsen	336.800.000
§ 14.	Skúlamál Undervisningsvæsen	425.014.000
§ 15.	Vísindi, bókmentir og list Videnskab, litteratur og kunst	105.903.000
§ 16.	Fiskivinna, sigling o.t. Fiskeri, søfart o.l.	381.691.000
§ 17.	Landbúnaður og matrikulering Landbrug og matrikulering	52.319.000
§ 18.	Handil, iðnaður v.m. Handel, industri m.v.	43.763.000
§ 19.	Almenn forsorg Socialvæsen	827.462.000
§ 20.	Pensjónsútreiðslur Pensionsudgifter	5.265.000
§ 21.	Effektivar veðhaldsbindingar Effektive garantiforpligtelser	45.000.000
§ 22.	Aðrar og ovissar útreiðslur Andre og uvisse udgifter	6.135.000
§ 23.	At leggja í ymsar grunnar v.m. Henlæggelser til forskellige fonds m.v.	105.741.000
§ 24.	Avdráttir av lánum Afdrag på lån	4.000.000
§ 25.	Avskrivingar Afskrivninger	54.305.000
§ 26.	Ymsar ognarútreiðslur Diverse ejendomsudgifter	700.000
§ 27.	Reguleringskonto Reguleringskonto	0
	Tilsamans/Ialt	2.986.610.000
	Meirinntøka/Merindtægt	21.732.000
		3.008.342.000

Yvirlit yvir flytingar á ogna- og kapitalkonti
í fíggjararinum 1989

Oversigt over bevægelser på formue- og kapitalkonti
i finansåret 1989

		Brutto inntøka indtægt kr. (1.000)	Brutto útreiðsla udgift kr. (1.000)	Netto inntøka indtægt kr. (1.000)	Netto útreiðsla udgift kr. (1.000)
§ 30.	Kassakonto	351.229		351.229	
	Kassekonto				
§ 31.	Virðisbrov		750		750
	Værdipapirer				
§ 32.	Útlán	9.575	7.000	2.575	
	Udlån				
§ 33.	Inntøkueftirstøður		67.050		67.050
	Indtægtsrestancer				
§ 34.	Aktiv hjá grunnum	423.026	662.100		239.074
	Fondes aktiver				
§ 35.	Aktiv hjá deponentum		80.000		80.000
	Deponenters aktiver				
§ 36.	Millumrokningar til goðar	112.408	158.325		45.917
	Mellemregning til gode				
§ 37.	Fastar ognir og anlegg	40.750	2.000	38.750	
	Fast ejendom og anlæg				
§ 38.	Skip	16.500		16.500	
	Skibe				
§ 39.	Millumrokning við nýtt tiggjarar	150.000	350.000		200.000
	Mellemregning med nyt tinansar				
§ 40.	Millumrokning, skuld	1.000		1.000	
	Mellemregning, gæld				
§ 41.	Lán		58.000		58.000
	Lån				
§ 42.	Deposita	15.000		15.000	
	Deposita				
§ 43.	Grunnar	666.000	426.926	239.074	
	Fonds				
§ 44.	Burturlegg, og avskrivingar	4.000	39.000		35.000
	Henlæggelser og afskrivninger				
§ 45.	Kapitalkonti	61.563		61.563	
	Kapitalkonti				
		1.851.151	1.851.151	725.791	725.791

INNTØKUR:
INDTÆGTER:

Landskassans inntøkur í fíggjararinum 1989 verða mettar sum tilskilað í §§ 1-9.
I finansaret 1989 ansiás landskassens indtægter som anført i §§ 1-9.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 1	**Skattir** **Skatter**			
1201	Vanligur landsskattur Sædvanlig landsskat	1.004.800	1.030.000	1.120.000
1507	Sjómansskattur Sømandsskat	14.281	8.000	0
1702	Rentuskattur Renteskat	27.432	14.000	30.000
1804	Vegskattur Vejskat	28.245	30.000	30.000
		1.074.758	1.082.000	1.180.000
§ 2	**Toll- og framleiðslugjøld: skrásetingargjald** **Told- og produktionsafgifter: registreringsafgifter**			
2017	Tollgjøld Toldafgifter	952.137	815.000	850.000
2041	Brennioljugjald Brændselsolieafgift	93.367	65.000	65.000
2708	Framleiðslugjøld Produktionsafgifter	28.419	28.000	30.000
2713	Skrasetingargjald Registreringsafgifter			
	23615 Virðis- og vektargjald Værdi- og vægtafgift		160.000	160.000
	33014 Umskrásetingargjald Afgift for omregistrering	2.832	2.700	3.000
		1.076.755	1.070.700	1.108.000
§ 3	**Onnur gjøld** **Andre afgifter**			
3052	Gjøld fyri spiritusskamtanarkort Afgifter for spiritusrationeringskort	192	200	200
3102	Loyvisgjøld Afgifter for bevillinger	84	100	100
3154	Ferðaavgjald Rejseafgift	8.414	6.000	10.000
3204	Arvagjøld Arveafgifter	2.302	1.000	2.000
3256	Lestagjald Skibsafgift	88	100	100
3501	Bøtur Bøder		30	30
		11.080	7.430	12.430

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 4	**Innlukur av spæli** **Indtægter ved spil**			
4011	Avlop av happadrátti Overskud ved lotteri	255	600	600
4058	Burturlutingargjald Afgifter af lotteri	234	100	100
4096	Gjøld av øðrum vinningum Afgifter af andre gevinster	479	500	500
		968	1.200	1.200
§ 5	**Rentur og vinningsbýti v.m.** **Renter og udbytte m.v.**			
5105	Rentuinntøkur Renteindtægter	36.024	25.000	36.000
5207	Rentuútreiðslur Renteudgifter	- 44.596	- 40.854	- 33.000
		-8.572	- 15.854	3.000
§ 6	**Landsstovnar** **Landsvirksomheder**			
6009	Tyrlutænastan Helikoptertjenesten	-	- 11.500	- 10.800
6014	Strandfaraskip Landsins Lagtingets kystfart	- 47.795	- 43.800	- 45.000
6033	Bygdaleiðir Busruter	- 23.061	- 22.000	- 24.000
6102	Tjaldurs Apotek Tjaldurs Apotek	2.298	- 1.585	3.026
6204	Telefonverkið Telefonvæsenet	26.081	26.000	39.825
6306	Útvarpið Radiofonien	199	0	0
6311	Sjónvarp Føroya TV	- 1.610	- 625	- 625
6358	Postverkið Postvæsenet	- 5.289	- 6.395	-5.355
6408	Oljugoymslur Olieanlæg	1.155	1.200	1.200
6567	Hvalastøðin við Áir Hvalstationen ved Áir	- 286	- 215	- 200
6572	Stórahús við Áir »Det store hus« ved Áir	- 45	- 45	- 400
		-48.353	- 58.965	- 43.359

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 7	**Partur av avlopi danska tjóðbankans samb. lóg** **Andel i den danske nationalbanks overskud ifølge lov**			
7011	Partur av avlopi danska tjóðbankans samb. lóg Andel i den danske Nationalbanks overskud ifg. lov	31.657	10.000	15.000
		31.657	10.000	15.000
§ 8	**Gjaldingar frá danska statinum** **Betalinger fra den danske stat**			
8001	Heildarveiting **Bloktilskud**	–	480.000	516.675
8005	Afturgjald Tilbagebetaling	–	182.800	214.391
		0	662.800	731.066
§ 9	**Ymsar inntøkur** **Diverse indtægter**			
9105	Ymsar inntøkur Diverse indtægter	15	5	5
		15	5	5
	Samanlagd inntøka	2.138.308	2.759.316	3.008.342

ÚTREIÐSLUR:
UDGIFTER:

Landskassans útreiðslur í roknskaparárinum 1989 eftir sum tiskilað í §§ 10-26.
I finansåret 1989 anslås landskassens udgifter som anført i §§ 10-26.

		Roknskapur 1987 kr. 1.000	Játtan 1988 kr. 1.000	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. 1.000
§ 10	**Løgtingið** **Lagtinget**			
10018	Løgtingsmenn Lagtingsmedlemmer	7.705	8.175	8.725
10106	Løgtingsbygningur Lagtingsbygning	1.217	325	765
10158	Løgtingsskrivstovan Lagtingssekretariatet	583	1.940	1.899
10163	Tingmannaráð Útnorðurs Vestnordens parlamentarikersamarb.	–	200	220
10208	Løgtingstíðindi Lagtingstidende	283	700	420
10301	Grannskoðan (extern) Revision (extern)	116	120	130
10403	Grannskoðan (intern) Revision (intern)	2.137	2.727	2.914
10505	Landsskattanevnd Landsskatteudvalg	81	100	101
10607	Norrønt Ráð Nordisk Råd	37	75	75
10709	Norrønt samstarv Nordisk samarbejde	99	75	100
10714	Menningargrunnur Útnorðurs Vestnordenfonden	134	40	45
		12.392	14.477	15.394
§ 11	**Landsfyrisitingin** **Landsadministrationen**			
11015	Løgmaður og landsstýri Lagmand og landsstyre	2.965	2.966	2.980
11048	Kunngerðarsavn og -blað Bekendtgørelsessamling og -blad	–	–	380
11053	Landsskrivstova Landskontor	10.810	15.525	17.666
11072	Fyrireiking av umhvørvisfyrisiting Forberedelse af miljøadministration	–	–	1.000
11103	Fiskivinnustova Fiskerikontor	700	–	–
11155	Uttanríkistænasta í Aberdeen Udenrigstjeneste i Aberdeen	1.106	686	795
11205	Føroysk viðskiftastova í København Det færøske repræsentationskontor i København	959	1.091	1.151
11219	Likningarráð, Norðoya deild Ligningsraad, Nordrø afd.	1.465	1.796	1.678
11224	Likningarráð, Suðuroyar deild Ligningsraad, Suderø afd.	891	1.055	1.077

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
11238	Likningarráð. Sandoyar deild	662	664	603
	Ligningsraad Sandø afd.			
11243	Likningarráð. Vága deild	915	841	889
	Ligningsraad Vågø afd.			
11257	Likningarráð	22.235	27.930	28.525
	Ligningsraad			
11262	Likningarráð. N.streymoyar deild	–	–	894
	Ligningsrad. N.streymoyar afd.			
11276	Skrásetningareftirlit	87	400	400
	Registertilsyn			
11281	Likningarráð. Fuglafj. deild	–	–	776
	Ligningsrad, Fuglafj. afd.			
11295	Likningarráð. Runavíkar deild	–	–	1.001
	Ligningsråd. Runavíkar afd.			
11307	Landsfólkayvirlit	903	1.145	1.100
	Folkeregister			
11359	Almannastova	13.445	16.049	17.052
	Socialforvaltning			
11409	Landsskúlafyrisitingin	9.891	15.048	15.863
	Landsskolcadministrationen			
11414	Fyrisiting av lestrarstuðli	–	–	750
	Administration af uddanneisesstøtte			
11447	Føroya Tollstova	6.514	8.875	10.317
	Færøernes Toldkontor			
11452	Føroya Gjaldstova	16.843	12.322	13.512
	Færøernes oppebørselskontor			
11466	Tollstovudeild í Klaksvík	748	894	855
	Toldkontor i Klaksvik			
11471	Tollstovudeild í Saltangará	705	1.030	1.097
	Toldkontor i Saltangará			
11485	Tollstovudeild í Fuglafirði	520	593	746
	Toldkontor i Fuglafirði			
11499	Tollstovudeild á Tvøroyri	651	648	782
	Toldkontor i Tvøroyri			
11502	Tollstovudeild í Vági	489	514	539
	Toldkontor i Vági			
11516	Tollstovudeild í Sørvági	405	536	486
	Toldkontor i Sørvagi			
11521	Tollstovudeild í Norðurstreymoy	–	–	600
	Toldkontor i Norðurstreymoy			
11535	Tollstovudeild á Sandi	–	–	500
	Toldkontor på Sand			
11549	Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald		65	0
	Kontorholdsgodtgørelse til syslerne			
11554	Tolleftirlitið	5.019	4.949	5.382
	Toldkontrollen			
11568	Trygdareftirlit	547	862	–
	Sikkerhedskontrol			
11604	Valuta- og prísráð	1.180	1.564	1.542
	Valuta- og prisråd			

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
11656	Lønarráð Lønningsråd	–	25	50
11661	Heilsu- og heimasjúkrasystrafyrisitingin Administration af sundheds- og hjemmesygeplejeordningen	944	1.288	1.618
11703	Búskaparráð Økonomisk råd	318	453	433
11709	Hagdeildin Statistisk kontor	3.451	4.438	4.900
11725	Stovnseting av landsbanka v.m. Etablering af landsbank m.v.	–	4.000	3.000
11758	Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands Rejse og dagpenge inden- og udenlands	7.074	4.000	5.000
11808	Innheintingarumboðslut Udgifter ved inkasso	376	300	400
11851	Ognin Tinganes Ejendommen Tinganes	1.702	2.383	2.939
11901	Landsverkfrøðingsskrivstova Landsingeniørens kontor	11.005	12.686	12.590
11953	Fyrisitingarhús í grunn Administrationsbygning i fond	1.000	1.000	1.000
		125.725	148.621	162.915

§ 12	**Heilsumál** **Sundhedsvæsen**			
12007	Sjúkrakassar Sygekasser	–	10.000	11.000
12012	Hjálpitólamiðstøð Central for hjælpeudstyr	–	3.480	4.250
12026	Útreiðsiur viðv. Ríkishospitalinum Udgifter vedr. Rigshospitalet	–	22.000	22.800
12109	Landssjúkrahúsið (D.A.H.) Landssygehuset (D.A.H.)	196.892	236.092	252.639
12202	Klaksvíkar sjúkrahús Klaksvik sygehus	23.942	43.182	47.018
12304	Suðuroyar sjúkrahús Suderø sygehus	11.416	23.519	28.680
12318	Sjúkrahúsbygging, í grunn (viðm.) Opførelse af hospitaler, i fond (anm.)	–	16.000	25.000
12406	Heilsumiðstøðir, í grunn Sundhedscentre, i fond	2.000	3.000	2.000
12411	Planlegging fyri sjúkrahúsverkið Planlægning for sygehusvæsenet	165	–	–
12508	Læknar Læger	517	1.873	1.873
12513	Amanuensis Amanuensis	–	100	100
12653	Heilsu- heimasjúkrasystraskipan Sundheds- og hjemmesygeplejeordning	6.059	10.049	12.920

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
12672	Skúlalæknaskipan	114	150	264
	Skolelægeordning			
12755	Serlækni i geriatri	–	–	500
	Specialist i geriatri			
12769	Arbeiðsmedisinsk klinikk	–	870	779
	Arbejdsmedicinsk klinik			
12774	Upplýsing um eyðkvæmi	–	400	400
	Oplysning om AIDS			
12907	Ymiskar útreiðslur:			
	Diverse udgifter:			
	303011 Farsóttir	11	70	70
	Epidemiske sygdomme			
	303044 Hvíldarheimið »Naina«	1.000	1.300	1.600
	Hvilehjemmet »Naina«			
	303077 Vaksinatiónir	166	620	600
	Vaccinationer			
	303107 Upplýsing um getnaðarfyribyrging	356	265	265
	Oplysning om svangerskabsforebyggelse			
	303115 Tubbaksráð	–	100	250
	Tobaksråd			
	303148 Heilsukanningar av barnakonum	–	280	280
	Sundhedskontrol for gravide			
	303156 Læknakanningar av børnum	–	700	700
	Lægeundersøgelse af børn			
	303164 Kanning og viðgerð av kynssjúkum	–	65	65
	Undersøgelse og behandling af kønssygdomme			
	373305 Landsstýrinum at ráða yvir	166	150	150
	Landsstyret at råde over			
		142.904	374.265	414.203

Viðmerkingar
til § 12.12318

Sambært lóg skal setast 25 mió. kr. um árið í grunn í 6 ár, fyrstu fer í 1989.

Anmærkninger
til § 12.12318

Ifølge lov skal afsættes 25 mio. kr. årlig i fond i 6 år, første gang i 1989.

§ 13	**Samferðslumál**			
	Kommunikationsvæsen			
13001	Nýggir vegir og bryr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum	114.747	107.200	122.500
	Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje			
13023	Havnagerð, í grunn	42.500	60.500	82.800
	Havnebygning, i fond			
13037	Lendingar, í grunn	26.400	25.000	28.000
	Landingspladser, i fond			
13042	Flogferðsla, í grunn	12.000	13.000	25.000
	Flyvetrafik, i fond			

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
13061	Berghols- og brúgvagerð, í grunn	22.000	58.000	63.000
	Tunnel- og brobygning, i fond			
13075	Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn (viðm.)	6.500	6.000	6.000
	Tilskud til kommuner til asfaltering, i fond (anm.)			
13089	Byggi- og rakstrargrunnur postverksins	–	3.000	3.000
	Postvæsenets bygge- og driftsfond			
13106	Byggigrunnur Strandferðslunnar	–	–	1.500
	Kystfartens byggefond			
13111	Millumbylgjustøð	–	–	3.000
	Mellembølgestation			
13227	Vegagerð í sambandi við brennistøð	1.772	6.300	2.000
	Vejbygger i forbindelse med forbrændingsanstalt			
		225.919	279.000	336.800

Viðmerkingar
til § 13.13075

Kommununar eiga kr. 150,- pr. íbúgva pr. ár seinastu fólkatelling.

Anmærkninger
til § 13.13075

Kommunerne tildeles kr. 150.- pr. beboer pr. år den seneste folketælling.

§ 14	**Skúlamál**			
	Undervisningsvæsen			
14053	Felagsútreiðslur tyri skúlaverkið	1.085	1.224	1.890
	Fællesudgifter for skolevæsenet			
14067	Endurgjald til rithøvundar	100	250	250
	Refusion til forfattere			
14103	Fólkaskúlin	66.052	164.215	178.100
	Folkeskolen			
14155	HF-skeið í Suðuroy	3.241	3.286	3.908
	HF-kursus i Suðuroy			
14169	HF-skeið í Klaksvík	2.648	3.113	2.849
	HF-kursus i Klaksvik			
14174	Eysturoyar studentaskúli og HF-skeið	9.954	12.077	12.308
	Eysturoyar gymnasium og HF-kursus			
14205	Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum	18.508	19.888	20.477
	Gymnasium og HF-kursus i Hoydølum			
14257	Kostdeild studentaskúlans	2.086	2.734	2.538
	Gymnasiets kostafdeling			
14262	Studentaskúlaheim í grunn	–	–	300
	Studenterkollegier i fond			
14307	Føroya Sjómansskúli	9.998	8.279	6.726
	Færøernes Navigationsskole			
14397	Tekniski skúlin í Klaksvík	–	5.257	4.900
	Teknisk skole i Klaksvik			
14409	Klaksvíkar Sjómansskúli	1.537	2.198	2.345
	Klaksvik Navigationsskole			

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
14414	Føroya Maskinskuli	3.848	8.516	7.846
	Færøernes Maskinskole			
14433	Maskinistutbúgving í Klaksvík	298	318	351
	Maskinistuddannelse i Klaksvik			
14447	Tekniskur skúli í Tórshavn	–	14.822	13.000
	Teknisk skole i Tórshavn			
14452	Skúlaheim í Tórshavn	–	3.002	3.155
	Skolehjem i Tórshavn.			
14466	Skúlaheim í Klaksvík	–	1.765	1.739
	Skolehjem i Klaksvik			
14471	Útgerð til tekniskar skular og handilsskúlar	–	2.550	4.450
	Udstyr til tekniske skoler og handelsskoler			
14485	Føroya Handilsskuli	–	9.518	11.500
	Færøernes Handelsskole			
14499	Føroya Læraraskúli	–	10.615	11.000
	Færøernes Seminarium			
14502	Føroya Fólkaháskúli	2.332	2.577	2.800
	Færøernes Folkehøjskole			
14516	Privatir skúlar	–	1.000	1.000
	Private skoler			
14554	Húsarhaldsskúlar	560	772	660
	Husholdningsskoler			
14604	Fritíðarundirvísing	2.339	10.805	11.000
	Fritidsundervisning			
14618	Studningur til musikkskúlar	2.987	4.459	4.350
	Tilskud til musikskoler			
14656	Landsmiðstøð fyri undirvísingarambøð	615	2.759	2.817
	Landscentral for undervisningsmateriale			
14658	Útbúgvingarstyrkur	–	10.000	–
	Uddannelsesstøtte			
14661	Skúli f. fiskaídnað og havbúnað	–	1.146	2.000
	Skole f. fiskeindustri og havbrug			
14675	Sjóvinnuskúli	–	2.500	2.000
	Søfartsskole			
14901	Ítrótt:			
	Idræt:			
.	313103 Lánsgr. til ítróttarani	100	100	100
	Laanefond til idrætsanlæg			
	313128 Studningur til Í.S.F.	2.150	2.940	4.000
	Tilskud til I.S.F.			
	313136 Studn. til ferðir innanoyggja	1.480	1.500	1.500
	Tilskud til indenlands rejser			
14953	Ymiskir studningar:			
	Diverse tilskud:			
	313152 Grunnur til útbúgving	10.000	15.000	47.000
	Fond til uddannelse			
	313215 Lærlingar	200	200	200
	Lærlinge			
	313223 Landbúnaðarnæmingar	–	40	40
	Landbrugselever			

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
313256	Ymisk framhaldsundirvising .... Diverse videreuddannelser	–	15	15
313264	Skúlabarnaferðir uttanlands .... Skolebørns rejser udenlands	81	65	65
313272	Skúlabarnaferðir innanoyggja .. Skolebørns rejser indenlands	361	450	450
313302	Ítróttar- og skúlabyggingar. ..... Idræts- og skolebygget.	19.000	27.000	27.000
313319	Sjómansskúli í grunn ..... Navigationsskole i fond	8.000	7.000	2.000
313335	Studentaskuli í Hoydølum. í grunn ..... Gymnasium i Hoydølum i fond.	500	500	1.000
313343	Aðrir stud.- og HF-skúlar í grunn ..... Andre gymnasier og HF-skoler. i fond	2.000	2.000	9.000
313351	Næmingastudningur til listamenn ..... Tilskud til kunstneres uddannelse	35	50	50
313376	MFS og MFÚ ..... MFS og MFU	140	174	225
313384	Nørrøna Felagið	160	205	225
313406	Studn. til fremmand íð lesa í Føroyum ..... Tilskud til ikke-færinger. der studerer på Færøerne	20	35	35
313422	Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir ..... Landsskoleadministrationen at råde over	88	0	0
313439	Landskúlafyrisitingini at ráða yvir: Eftirútbúgving av handvetkarum ..... Landsskoleadministrationen at råde over: Efteruddannelse af håndværkere	132	600	600
313455	Ungmannafeløgini og skótarørslan ..... Ungdomsforeningerne og spejderbevægelsen	600	500	700
313471	Eftirútbúgving av sjómonnum Efteruddannelse af sømænd	67	116	200
313496	Undirvisingartilfar til framhaldsskúlar ..... Undervisningsmateriel til fortsættelsesskoler	–	2.000	2.000
313559	Læraraskúli í grunn ..... Seminarium i fond	–	–	1.000
313567	Maskinskúli í grunn ..... Maskinskole i fond	–	–	2.000

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
313575	Tekniskur skúli í grunn ..... Teknisk skole i fond	–	–	5.000
313583	Sjóvinnuskúli í grunn ..... Søfartsskole i fond	–	–	2.000
313591	Fiskiíðnaðar skúli í grunn ..... Fiskeindustri skole i fond	–	–	2.000
373305	Landsstýrinum at raða yvir ..... Landsstyret at rade over	495	275	350
		173.797	370.410	425.014

Viðmerkingar
til § 14.14953/313302

Studningur til graslíkisvøllir verður at vera saman við fíggjarnevndini.

Anmærkninger
til 14.14953/313302

Tilskud til kunstgræsbaner bevilges sammen med finansudvalget.

§ 15	**Vísindi, bókmentir og list** **Videnskab, litteratur og kunst**			
15109	Landsbókasavn ..... Landsbibliotek	3.921	4.720	5.172
15202	Fólkabókasøvn (viðm.) ..... Folkebiblioteker (anm.)	4.529	10.851	12.516
15304	Landsskjalasavn ..... Landsarkiv	2.561	2.755	2.863
15406	Føroya Fornminnissavn ..... Færøernes museum	4.876	5.889	6.704
15508	Bygdasøvn ..... Bygdemuseer	552	1.738	2.177
15551	Fiskirannsóknarstovan ..... Fiskeribiologisk laboratorium	13.413	6.620	7.191
15565	BIOFAR-prosjektið ..... BIOFAR-projektet	–	835	264
15653	Fuglakanningarstøð v.m. ..... Ornitologisk station m.v.	157	155	161
15672	Lógarsavn ..... Lovsamling	–	600	600
15703	Náttúrugripasavn ..... Naturhistorisk samling	2.555	4.179	4.482
15717	Samarbeiðið D.G.U./ Føroya Jarðfrøðisavn ..... Samarbejdet D.G.U./ Føroya Jarðfrøðisavn	441	457	658
15755	Fróðskaparsetur Føroya ..... Færøernes Akademi	9.970	13.049	15.826
15793	Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur) ..... Institutioner på Debesartrøð (fællesudgifter)	1.306	1.556	1.763

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
15805	Heilsufrøðilig starvsstova	4.403	5.050	5.455
	Hygiejnisk laboratorium			
15857	Náttúrufriðingarnevndir	263	400	400
	Naturfredningsudvalg			
15881	Føroyska málnevndin	244	274	298
	Færøsk sprognævn			
15895	Tónleikur og sangur	700	600	600
	Musik og sang			
15907	Ymiskir studningar:			
	Diverse tilskud:			
	323012 Barnablað	50	60	120
	Børneblade			
	323037 Sjónleikur	465	500	2.200
	Teater			
	323053 Til útgávu av barnabókum	900	1.000	1.500
	Til udgivelse af børnebøger			
	323086 Sømdarpeningur til skald			
	og listamenn (viðm.)	190	216	250
	Hædersgaver til digtere			
	og kunstnere (anm.)			
	323108 Lán og studn. grunnur			
	til bókaútgávu	300	300	300
	Låne- og tilskudsf. til			
	udg. af bøger			
	323116 Skúlabókaútgáva	3.600	4.600	4.900
	Udg. af skolebøger			
	323124 Norðurlandahús	571	598	630
	Nordisk hus			
	323132 Sjónleikarhús, í grunn	100	100	100
	Teater, i fond			
	323149 Fornminnissavn, í grunn	2.000	1.000	1.000
	Museum, i fond			
	323157 Útvarpssendistøðir í gr. (viðm.)	2.000	7.000	7.000
	Radiosender, i fond (anm.)			
	323165 Rakstur av Bókamiðsøluni	315	448	448
	Drift af Bókamidsølan			
	323173 Orðabókaútgáva í grunni	225	250	250
	Udgivelse af høger, i fond			
	323181 Ungdóms- og bygdahús			
	í grunni	1.800	3.000	2.000
	Ungdoms- og bygdehus, i fond			
	323228 Mentunargrunnurin (MFL)	1.300	1.300	2.000
	Kulturfonden (MFL)			
	323236 Listasøvn	400	400	500
	Kunstsamlinger			
	323244 Savn í Hoyvík, í grunn	–	500	500
	Museum i Hoyvik, i fond			
	323269 Føroyskt-íslendskt-grønlandskt			
	mentanarligt samstarv	–	200	200
	Færøsk-islandsk-grønlandsk			
	kultureit samarbejde			
	323307 Fiskirannsóknarstova, í grunn ..	3.500	2.000	2.000
	Fiskeribiol. laborat. i fond			

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
323331	Útvarp Føroya tilskot til avdráttir av lánum ..... Færøernes Radio tilskud til afdrag på lån	4.000	4.000	4.000
323348	Skjalasavn, í grunn ..... Landsarkiv i fond	2.000	2.000	2.500
323356	Kirkjubømúrurin, í grunn ..... Muren i Kirkebø i fond	500	1.000	1.275
323364	Sjónvarp Føroya ..... TV	626	650	650
323372	Sjónvarp í grunn ..... Fjernsyn i fond	7.000	7.000	2.000
323468	Náttúrugripasavn í grunn ..... Naturhistorisk museum i fond	–	–	1.000
323476	Fróðskaparsetrið í grunn ..... Akademi i fond	–	–	1.000
373305	Landsstýrinum at raða yvir ..... Landsst. at råde over	352	450	450
		82.085	98.300	105.903

Viðmerking
til § 15.15202
Rakstrarstuðningur verður eisini at gaida skúlabókasøvn.

Anmærkning
til §15.15202
Driftstilskud ydes også til skolebiblioteker.

til § 15.15907/323086
Sømdargávur fyri skaldskap og list:

	kr.
Janus Kamban	12.500
William Heinesen	12.500
Ingálvur av Reyni	12.500
Hans Jacob Højgaard	12.500
Valdemar Poulsen	12.500
Robert Joensen	12.500
Eyvindur Mohr	12.500
Jens Pauli Heinesen	12.500
Bárður Jákupsson	12.500
Zacharias Heinesen	12.500

til § 15-15907/323086
Hædersgaver vedrørende litteratur og kunst:

	kr.
Karsten Hoydal	12.500
Chr. Matras	12.500
Elinborg Lützen	12.500
Regin Dahl	12.500
Chr. Høj	12.500
Poulina Joensen	12.500
Hans J. Glerfoss	12.500
Rói Patursson	12.500
Frimod Joensen	12.500
Tróndur Patursson	12.500

til § 15.15907/323157
Játtan 7 mill. kr. um árið í 3 ár. í grunn. Hetta er 2. árið.

til § 15.15907/323157
Bevilling 7 mill. kr. om året i 3 år, henlæggelse i fond. Dette er det 2. år.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 16	**Fiskivinna. sigling o.t.** **Fiskeri. søfart o.l.**			
16018	Vrakarastovnur	2.170	2.598	2.888
	Vragerinstitution			
16106	Nautiskt Royndarkamar	27	28	27
	Nautisk prøvekammer			
16208	Sjómansheim í grunn	263	450	375
	Sømandshjem i fond			
16301	Vaktar- og bjargingartænasta	16.206	18.312	18.563
	Vagt- og bjærgningstjeneste			
16403	Royndir innan havbúnað	1.943	2.228	2.425
	Forsøg vedr. fiskeopdræt			
16505	Prísásetingarnevndin fyri fisk	74	100	–
	Udvalg til fastsættelse af fiskepriser			
16607	Fiskivinnuráð	234	242	240
	Fiskeriråd			
16612	Aliráðið	808	1.381	1.053
	Fiskeopdrætsrad			
16626	»Magnus Heinason«	–	10.000	9.370
	»Magnus Heinason«			
16904	Aðrir studningar:			
	Andre tilskud:			
333017	Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna	261.500	260.000	295.000
	Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet			
333025	Studningur til grunnin til endurnýgging av fiski- og farmaskipaflotanum	100.000	50.000	15.000
	Tilskud til fonden til fornyelse af fiske- og fragtskibe			
333033	Grindir	26	50	50
	Grindefangst			
333058	Endurgjald fyri upphegging av gomlum fiskiskipum	–	40.000	25.000
	Erstatning for kondemnering af gamle fiskefartøjer			
333074	Praktiskar fiskirovndir í grunn (viðm.)	5.000	5.000	6.000
	Praktiske fiskeriforsøg i fond (anm.)			
333082	Vaktarskip. í grunn	3.000	5.000	5.000
	Vagtskib i fond			
333104	Trygdargrunnur veiðimanna	251	300	–
	Fiskernes garantifond			
333199	Til upplýsing um grind	1.752	400	400
	Til oplysning om grindehvalfangst			
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	471	250	300
	Landsstyret at råde over			
		393.725	396.339	381.691

Viðmerkingar
til § 16.904/333074

Praktiskar fiskirovndir verða gjørdar í samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd.

Anmærkninger
til § 16.904/333074

Praktiske fiskeriforsøg udføres i samråd med lagtingets fiskeriudvalg.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 17	**Landbúnaður og matrikulering** **Landbrug og matrikulering**			
17015	Landsdjóralæknaembætið ..... Landsdyrlægeembedet	1.368	2.536	3.949
17048	Landbúnaðarráðgevari ..... Landbrugskonsulent	322	377	402
17103	Útskifting og matrikulstova ..... Udskiftning og matrikelkontor	5.719	7.435	8.608
17205	Royndarstøðin ..... Forsøgsstationen	4.340	6.747	6.800
17219	Avlovsingarskipan fyri mjólkarframleiðarar, í grunn ..... Vikarordning for mælkeproducenter, i fond	312	464	580
17901	Aðrir studningar: Andre tilskud:			
	343013 Húsdjóraaling ..... Husdyropdræt	400	400	400
	343021 Nýdyrking v.m. ..... Nyopdyrkning m.v.	2.000	2.000	2.800
	343038 Rentustudningur til landbúnaðarlán ..... Rentetilskud til landbrugslån	2.300	2.300	2.200
	343046 Studningur til ilegging í landbúnaðin (viðm.) ..... Finansieringstilskud til landbruget (anm.)	6.000	6.000	6.000
	343054 Studningur til mjólkar-framleiðslu ..... Tilskud til mælkeproduktionen	11.500	12.975	13.000
	343062 Studningur til súrhoyggjabrunnar ..... Tilskud til græssiloer	400	400	400
	343079 Skógrøkt landsins ..... Landets skovrøgt	1.000	1.000	1.890
	343087 Skeiðvirksemi ..... Kursusvirksomhed	26	100	100
	343117 Vakstrarhús í grunn ..... Drivhuse i fond	1.000	1.000	1.000
	343125 Studn. til stráfóður (viðm.) ..... Tilskud til stråfoder (anm.)	800	800	900
	343133 Studn. til kjøt og egg ..... Tilskud til kød og æg	2.450	2.930	3.190
	373305 Landsstýrinum at raða yvir Til landsstyret at råde over	808	100	100
		40.745	47.564	52.319

Viðmerkingar
til § 17.17901/343046

Játtanin verður tó ikki at nýta til sethúsa-bygging.

Anmærkninger
til § 17.17901/343046

Bevillingen må dog ikke anvendes til opførelse af beboelseshuse.

Viðmerkingar
til § 17.17901/343125

Studningurin umfatar eisini í minsta lagi 4 kvigu- og/ella tarvaviðsetingar.

Anmærkninger
til § 17.17901/343125

Støtten omfatter også mindst opdræt af 4 kvier og/eller tyre.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 18	**Handil. ídnaður o.a.** **Handel, industri m.v.**			
18109	Arbeiðseftirlit Arbejdstilsyn	1.987	2.899	2.398
18124	Arbeiðseftirlitið í Klaksvík Arbejdstilsynet i Klaksvik	421	616	636
18128	Arbeiðseftirlitið á Tvøroyri Arbeidstilsynet i Tvøroyri	190	615	645
18133	Arbeiðseftirlitið í Saltangará Arbeidstilsynet i Saltangará	–	722	946
18147	Arbeiðseftirlitið í Vestmanna Arbeiðstilsynet i Vestmanna	–	–	712
18152	Brandvenjingarstøðin við Air Brandøvelsesstationen ved Air	339	372	300
18166	Brandeftirlit Brandtilsyn	–	800	950
18202	Bileftirlit Biltilsyn	3.275	3.110	1.863
18216	Radioeftirlit Radiotilsyn	380	260	270
18235	Ráðið fyri ferðslutrygd Rådet for færdselssikkerhed	875	952	1.139
18268	Filmseftirlitið Filmstilsynet	368	431	450
18304	Skipaskrá og -uppmáling Skibsregistrering og -opmåling	1.064	885	854
18318	Semingsmannaskipan Forligsinstitution	159	125	125
18323	Kolagrevstur Kulbrydning	630	1.000	800
18337	Læruráðið Lærerådet	317	1.456	1.613
18342	Skeiðvirksemi Kursusvirksomhed	134	200	200
18356	Ferðamannamiðstøðin Turistcentralen	4.047	4.001	3.482
18361	Menningarstova »Menningarstova«	2.000	2.000	2.730
18365	Javnstøðunevndin Ligestillingsudvalget	–	150	350
18907	Aðrir studningar: Diverse tilskud:			
	353026 Studul til ídnaðarfremjandi endamál, í grunn (viðm.) Støtte til industrifremmende formål, i fond (anm.)	5.000	5.000	5.000
	353034 At leggja í gistingarhúsgr. Henlæggelse i hotelfonden	600	600	800

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
353042	Til menningargrunn	10.000	14.000	14.000
	Til udviklingsfond			
353067	Studningur til lærupláss	3.386	2.000	2.000
	Tilskud til lærepladser			
353083	Til orkugrunn	3.000	1.000	1.000
	Til energifond			
353113	Føroysk vika í Danmark	700	–	–
	Færøsk uge i Danmark			
353121	Skeiðvirksemið til vinnuteiga ...	213	200	200
	Kursusvirksomhed			
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	519	300	300
	Landsstyret at råde over			
		39.614	43.694	43.763

Viðmerking
til § 18-18907/353026
Landsstýrið saman við fíggjarnevndini ráða yvir grunninum.

Anmærkning
til § 18-18907/353026
Landsstyret sammen med finansudvalget disponerer over tonden.

§ 19	**Almannamál v.m.**			
	Socialvæsen m.v.			
19042	Andveikraverndin, bústovnar	3.356	24.517	30.516
	Åndsvageforsorgen, boliger			
19056	Fólkapensjón	110.973	170.350	195.400
	Folkepension			
19061	Hækkingar í fólka- og avlamispensiónini	8.391	30.700	8.000
	Forhøjelse i folke- og invalidepensionen			
19075	Ellisheim	3.185	71.178	80.640
	Alderdomshjem			
19089	Vistarheim fyri pensionistar	–	4.828	5.405
	Pensionistboliger			
19106	Avlamispensjón	37.076	63.140	75.835
	Invalidepension			
19208	Einkjubarnastyrkur v.m.	1.466	3.227	3.225
	Børnebidrag til enlige forsørgere			
19301	Einkjupensjón	1.424	1.558	1.565
	Enkepension			
19403	Vanlig forsorg	27.227	48.994	55.000
	Almindelig forsorg			
19519	Uppiskovtisveiting	–	692	765
	Tillægsydelse			
19557	Barnaforsorg	7.572	14.827	16.300
	Børneforsorg			
19607	Heimahjálparskipanin	21.149	49.180	51.000
	Hjemmehjælpordningen			
19659	Dagpeningaskipan	27.443	77.112	80.000
	Dagpengeordning			

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
19664	Bjálving av húsum hjá pensionistum	–	3.000	3.000
	Isolering af pensionistboliger			
19752	Brennistudn. til pensionistar	3.962	4.000	7.360
	Brændselstilskud til pensionister			
19802	Samsyning tyri at ansa ohjálpnum heima	8.540	6.930	10.000
	Vederlag for at passe ældre i hjemmet	–	29.819	42.000
19850	Dagstovnar			
	Daginstitutioner			
19904	Ymsir studningar:			
	Forskellige tilskud:			
	363287 Várdar íbúðir til pensionistar í grunn	–	–	3.000
	Beskyttede pensionistboliger i alt	–	–	500
	363382 Møðrahjálp	–	–	200
	Mødrehjælp			
	363399 Kreppumóstøð	17.383	48.300	66.000
	Krisecenter			
	363524 Barnastyrkur v.m.	4.000	4.200	3.000
	Børnetilskud m.m.			
	363532 Serforsorgin, bygging, í grunn ..	500	1.500	400
	Særforsorgen, bygn., i alt			
	363549 Kirkja í Keypmannahavn, í grunn	320	388	570
	Kirke i København, i alt			
	363557 Hús hjá Deyvatelagnum	–	600	1.000
	Døveforeningens hus			
	363565 Blindaheimið	–	14.056	14.464
	Blindehjemmet			
	363573 Andveikraverndin, føroyingar í Danmark	–	270	–
	Åndsvageforsorgen, færinger i Danmark			
	363581 Andveikraverndin, eykaurreiðslur heima	175	200	132
	Åndsvageforsorgen, ekstraudgifter hjemme			
	363598 Fráhaldsfelag Blákrossstovan ...	300	325	250
	Afholdsforening Blåkrossstovan			
	363603 Styrkveiting	180	360	360
	Understøttelse			
	363628 ALV	425	450	450
	ALV			
	363636 Fráhaldsteløg	0	30	30
	Afholdsforeninger			
	363644 »Reyði Krossur«			
	»Røde Kors«			
	363652 Hjálpargrunnur fyri óarbeiðsførar fiskimenn	300	400	400
	Fonden for uarbejdsdygtige fiskere			
	363669 Feløg teirra brekaðu	700	760	1.000
	Handikapforeninger			

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
363685	Húsalánsgrunnur ..... Huslånefond	15.000	27.000	30.000
363693	Kommunalur lánsgrunnur ..... Kommunal lånefond	3.000	3.000	500
363707	Arbeðslovsisgrunnur arbeiðarafelaganna ..... Arbejdertoreningers arbejdsløshedsfond	341	500	500
363715	Førovahús í København. í grunn ..... Førovahús i København. i fond	600	742	795
363731	Ansingar- og rektarheim í grunn ..... Opholds- og plejehjem. i fond	10.000	18.782	12.000
363748	Íbúðagrunnur ..... Boligfond	1.500	3.000	3.000
363756	Rentustuðningur til húsabygging ..... Rentetilskud til husbyggeri	758	300	300
363764	Vanlukkutryggingarráðið ..... Ulykkesforsikringsraadet	242	932	510
363777	Næmingaheim í grunn ..... Elevboliger : fond	3.000	5.829	6.000
363797	Ráðgev. f. føroyingar í Danm. . Rådgiv. f. færinger i Danmark	262	385	415
363819	Bústovnar fyri sinnisbrekað ..... Institutioner for sindslidende	705	1.350	2.500
363827	Hjálpargrunnur móti alkoholmisnytslu ..... Hjælpefond mod alkoholmisbrug	1.200	1.200	1.200
363835	Felagshús í Nuuk (viðm.) ..... Foreningshus i Nuuk (anm.)	125	125	125
363840	Menningarhjálp í grunn ..... Udviklingsbistand i fond	2.108	5.000	5.000
363851	Landsfelag pensionistanna ..... Pensionisternes landsforening	–	100	150
373305	Landsstýrinum at raða yvir ..... Til landsstyret at råde over	454	300	400
19918	Skúlin á Tróni ..... Specialskolen	3.363	13.093	16.300
		328.705	757.429	827.462

Viðmerking
til § 19.19904/363835
Játtan kr. 125.000 um árið yvir 4 ár.
Hetta er 4. árið.

Anmærkning
til § 19.19904/363835
Bevilling på kr. 125.000 om året i 4 år.
Dette er 4. rate.

		Rokrskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 20	**Pensiónsútreiðslur** **Pensionsudgifter**			
20013	Pensjónsútreiðslur: Pensionsudgifter:			
	103558 Pensiónir ..... Pensioner	676	566	650
	103612 Bíðipeningur ..... Ventepenge	1.562	1.500	415
	103629 Tænastumannaeftirlønir ..... Tjenestemandspensioner	3.964	4.329	4.200
		6.202	6.495	5.265
§ 21	**Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn** **Effektive garantiforpligtelser, i fond**			
21019	Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn ..... Effektive garantiforpligtelser, i fond	30.000	50.000	45.000
		30.000	50.000	45.000
§ 22	**Aðrar og óvissar útreiðslur** **Andre og uvisse udgifter**			
22104	Aðrar og óvissar útreiðslur: Andre og uvisse udgifter:			
	203507 Umboðan ..... Repræsentation	1.229	1.000	1.500
	253704 Útreiðslur av vali ..... Udgifter vedrørende valg	83	100	100
	253753 Dóms- og løgreglumál ..... Retsvæsen og politi	36	25	35
	253808 Stuðningur til politiska upplýsing v.m. (viðm.) ..... Tilskud til politisk oplysningsarbejde m.m. (anm.)	2.000	3.000	3.000
	373305 Landsstýrinum at ráða yvir ..... Til landsstyret at råde over	2.462	1000	1.500
		5.810	5.125	6.135

Viðmerkingar
til § 22.22104/253808

Hesin peningur verður eftir umsókn býttur millum politisku flokkarnar, ið aftaná hvørt løgtingsval eru umboðaðir á tingi og í mun til flokkanna atkvøðutal.

Anmærkninger
til § 22.22104/253808

Dette beløb bliver efter ansøgning fordelt mellem de politiske partier, der efter hvert lagtingsvalg er repræsenteret i lagtinget og i forhold til partiernes stemmetal.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Uppskot landsstýrisins 1989 kr. (1.000)
§ 23	**At leggja í ymsar grunnar v.m.** **Henlæggelse til forskellige fonds m.v.**			
23203	At leggja í ymsar grunnar v.m.: Henlæggelse til forskellige fonds m.v.:			
383015	Avlopið hjá apotekinum lagt í apotekaragrunnin Apotekets overskud henlagt til apotekerfonden	2.298	+ 1.585	3.026
383058	Avlopið hjá Telefonverkinum Telefonvæsenets overskud	26.081	26.000	39.825
383064	Avlop hjá Postverki Føroya Postvæsenets overskud	− 5.288	+ 6.395	+ 5.385
383102	Avlop hjá Útvarp Føroya Radioens overskud	199	0	0
383119	Avlop hjá Sjónvarp Føroya TV's overskud	− 1.610	+ 625	+ 625
383151	Til kirkjugrunnin Til kirkefonden	3.700	3.900	3.900
383168	Oljugrunnur Oliefond	43.367	65.000	65.000
		118.747	86.295	105.741

§ 24	**Burturleggingar til avdráttir av lánum** **Henlæggelser til afdrag på lån**			
24302	Burturleggingar í grunn til avdráttir Henlæggelser i fond til afdrag	27.400	21.544	4.000
§ 25	**Avskrivingar** **Afskrivninger**			
25401	Avskrivingar, bygningar og anlegg. Afskrivninger, bygninger og anlæg	51.286	58.603	54.305
§ 26	**Ymsar ognarútreiðslur** **Diverse ejendomsudgifter**			
26305	Ymsar ognarútreiðslur Diverse ejendomsudgifter	525	300	700
§ 27	**Reguleringskonto** **Reguleringskonto**			
27005	Reguleringskonto Reguleringskonto	0	0	0
	Samanlagdar útreiðslur Samlede udgifter	1.855.581	2.758.461	2.986.610
	Munur/Balance	282.727	855	21.732
		2.138.308	2.759.316	3.088.342

Flytingar á ognar- og kapitalkonti landskassans í fíggjarárinum 1989
Bevægelser pa landskassens formue- og kapitalkonti i finansaret 1989

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 30	**Kassakonto**	351.229.000	
	Kassekonto		
		351.229.000	
§ 31	**Virðisbrøv** **Værdipapirer**		
	Teknan av partapeningi í feløg ..... Aktietegning i selskaber		750.000
			750.000
§ 32	**Útlán** **Udlån**		
1	*Kommunur:* *Kommuner:* Avdráttir ..... Afdrag	75.000	
2	*Ymisk lán:* *Diverse lån:* 1. Avdráttir ..... Afdrag 2. Avskrivingar ..... Afskrivninger	9.000.000	
3	*Kurslán:* *Kurslån:* Avdráttir ..... Afdrag	500.000	
4.	Útgoldin lán ..... Udbetalte lån		7.000.000
		9.575.000	7.000.000
§ 33	**Inntøkueftirstøður** **Indtægtsrestancer**	kr. (1.000)	
1	*Skattur:* Nýggj álikning ..... *Skat:* Ny påligning *Skattur:* Goldin eftirstøða ..... *Skat:* Betalte restancer	1.100.000 1.045.000	55.000.000
2	*Sjúkrahús:* *Sygehuse:* Gjøld ..... Takster Goldið ..... Betalt	1.000 950	50.000
3	*Avdráttar- og rentueftirstøður:* Nýggjar ..... *Afdrags- og renterestancer:* Nye		12.000.000
			67.050.000

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 34	**Aktiv hjá grunnunum** **Fondes aktiver**		
1	*Apotekaragrunnurin:* *Apotekerfonden:*		
	1. Rentur		500.000
	Renter		
	2. Yvirskot	3.026.000	
	Overskud		
2	*Grunnurin til endurnýggjan av fiski og farmaskipaflotanum:* *Fonden til fornyelse af fiske- og fragtskibsflåden:*		
	1. Rentur		2.500.000
	Renter		
	2. Burturlagt samb. rakstrarætlan		15.000.000
	Henlagt i henhold til driftsbudget		
	3. Avskrivað studningslán	5.000.000	
	Afskrevet på tilskudslån		
	4. Aðrar útreiðslur	15.000.000	
	Andre udgifter		
3	*Byggigrunnur strandferðslu landsins:* *Byggefonden for kystfarten:*		
	1. Rentur		0
	Renter		
	2. Burturlagt samb. rakstrarætlan		300.000.000
	Henlagt i henhold til driftsbudget		
	3. Nýtt úr grunninum	0	
	Forbrug af fonden		
4	*Aðrir grunnar:* *Andre fonds:*		
	1. Rentur og gjald		1.100.000
	Renter og bidrag		
	2. Játtan		640.000.000
	Bevilling		
	3. Binding av fyrr játtaðum pentagi		0
	Båndlægning af tidligere bevillinger		
	4. Nýtt úr grunninum	400.000.000	
	Forbrug af fondene		
		423.026.000	662.100.000
§ 35	**Aktiv hjá deponentum** **Deponenters aktiver**		80.000.000
			80.000.000

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 36	**Millumrokning til góðar** **Mellemregning til gode**		
	Kommunur: *Kommuner:*		
	1. Inngoldið Indbetalt	8.000.000	
	2. Útlagt Udlagt		9.000.000
2	*Strandferðsian:* *Kystfarten:*		
	1. Útlagt Udlagt		55.800.000
	2. Undirskot sambært rakstrarætlan Underskud i henhold til driftsbudget	55.800.000	
3	*Telefonverkið:* *Telefonvæsenet:*		
	1. Yvirskot samb. rakstrarætlan Overskud i henhold til driftsbudget		39.825.000
4	*Útvarpið:* *Radiofonien:*		
	1. Undirskot sambært rakstrarætlan Underskud i henhold til driftsbudget	0	
5	*Matrikulstovan:* *Matrikelkontoret:*		
	1. Útlagt Udlagt		8.700.000
	2. Flutt frá rakstrarætlan Overført fra driftsbudget	8.608.000	
6	*Veðhald:* *Garantiforpligtelser:*		
	1. Útlagt Udlagt		45.000.000
	2. Avskrivað uppá fyrr goldin útlegg Afskrevet på tidl. indfriede gældsforpligtelser	40.000.000	
	3. Goldið upp á fyrr goldin útlegg Betalt på tidligere indfriede garantiforpl.	0	
		112.408.000	158.325.000

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 37	**Fastar ognir og anlegg** **Fast ejendom og anlæg**		
1	*Sethús:* *Beboelseshuse:* 1. Avskrivingar ..... Afskrivninger	50.000	
2	*Ognir í almennari nýtslu:* *Ejendomme i offentligt brug:* 1. Avskrivingar ..... Afskrivninger	3.300.000	
3	*Hús í gerð:* *Bygninger under opførelse:* Løgtings- og landsfyrisitingarhús ..... Lagtings- og administrationsbygning Grunnurin ..... Fonden	0 2.000.000	2.000.000
4	*Anlegg:* *Anlæg* 1. Avskrivingar ..... Afskrivninger 2. Vegir og havnir o.a. fíggjað við lántøku ..... Veje og havne finansieret ved optagelse af lån	1.000.000 34.400.000	0
		40.750.000	2.000.000
§ 38	**Skip** **Skibe**		
1	Bygging av rannsoknarskipi ..... Bygning af et havundersøgelsesskib Grunnurin ..... Fonden	0 0	
2	Bygging av strandfaraskipi ..... Bygning af kysttøj Grunnurin ..... Fonden	0 0	
3	Avskrivingar ..... Afskrivninger	16.500.000	
		16.500.000	
§ 39	**Millumrokning við nýtt fíggjarár** **Mellemregning ved nyt finansår**		
1	Inngjaldingar 1989 viðv. 1988 ..... Indbetalinger i 1989 vedr. 1988	150.000.000	
2	Útgjaldingar í 1989 viðv. 1988 Udbetalinger i 1989 vedr. 1988		350.000.000
		150.000.000	350.000.000

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 40	**Millumrokning, skuld** **Mellemregning, gæld**		
	Ymisk millumrokningarkonti vaksa við	1.000.000	
	Diverse mellemregningskonti forøges med	1.000.000	
§ 41	**Lán** **Lån**		
1	Avdráttur		58.000.000
	Afdrag		
2	Nýupptikin lán		0
	Nyoptagne lån		58.000.000
§ 42	**Deposita** **Deposita**		
	Goldið av deponentum	15.000.000	
	Betalt af deponenter	15.000.000	
§ 43	**Grunnar** **Fonds**		
1	*Apotekaragrunnurin:* *Apotekerfonden:*		
	1. Rentur	500.000	
	Renter		
	2. Yvirskot		3.026.000
	Overskud		
2	*Grunnurin til endurn. av fiski- og farmaskipaflotanum:* *Fonden til fornyelse af fiske og fragtskibeflåden:*		
	1. Rentur	2.500.000	
	Renter		
	2. Játtan	15.000.000	
	Bevilling		
	3. Avskrivað studningslán		5.000.000
	Afskrevet tilskudslån		
	4. Aðrar útreiðslur		15.000.000
	Andre udgifter		
3	*Byggigrunnur strandferðslu landsins:* *Byggefond for kystfarten:*		
	1. Rentur	0	
	Renter		
	2. Játtan	3.000.000	
	Bevilling		
	3. Nýtt úr grunninum		0
	Forbrug af fonden		0
4	*Kirkjugrunnurin:* *Kirkefonden:*		
	1. Játtan	3.900.000	
	Bevilling		
	2. Nýtt úr grunninum		3.900.000
	Forbrug af fonden		

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
5	*Aðrir grunnar:* *Andre fonde:*		
	1. Rentur og gjøld Renter og bidrag	1.100.000	
	2. Játtan Bevilling	640.000.000	
	3. Nýtt úr grunnunum Forbrug af fondene		400.000.000
		666.000.000	126.926.000

§ 44 Burturleggingar og avskrivingar
Henlæggelser og afskrivninger

1	*Avskrivingar- og avdráttargrunnur viðv. lánspeningi:* *Afskrivnings- og henlæggelsesfond vedrørende lån:*		
	1. Avdráttarburturleggingar viðv. lánum Henlæggelser vedr. afdr. på lån	4.000.000	
	2. Avskrivingar, studningslán Afskrivninger, tilskudslån		5.000.000
	3. Avskrivingar, vega- og aðrar anleggsbygging Afskrivninger, veje og andre anlægsarbejder		34.000.000
		4.000.000	39.000.000

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 45	**Kapitalkonti** **Kapitalkonti**		
1	Yvirskot telefonverksins Telefonvæsenets overskud	39.825.000	
2	Undirskot útvarpsins Radiofoniens underskud		0
3	Yvirskot frá rakstrarætlanini Overskud på drift	21.738.000	
		61.563.000	0

Tórshavn, 31. august 1988

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/ J. Hilduberg

Viðmerkingar til uppskot til fíggjarløgtingslóg 1989.

Hetta uppskot til fíggjarløgtingslóg, sum í dag verður lagt fyri tingið, er fyri fíggjarárið 1989.

Uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1989 javnvigar við 3.050.710.000 kr.

Sammett við fíggjarløgtingslógina fyri 1988, sum javnvigaði við 2.834.135.000 kr., er tað ein vøkstur uppá góð 7%.

Í 1985, 1986 og 1987 hava metingarnar um inntøkurnar hildið og tað sær eisini út til í løtuni at inntøkurnar fyri 1988 fara at halda.

Landsstýrið hevur eftir bestu sannføring mett skatta- og tollinntøkurnar varliga fyri 1989 út frá metingum um virksemi fyri komandi ár.

Heildarveitingin úr Danmark veksur í 1989 við 3,4%.

Hetta er seinasta uppskot til fíggjarløgtingslóg í hesum valskeiði.

Hesi seinastu 4 árini eru stórar broytingar hendar við fíggjarlógini.

At danski stuðulin bleiv umskipaður sum ein heildarveiting (blokkstuðul), hevur havt stórar broytingar við sær.

Fyrr vóru bert tær útreiðslurnar, sum vórðu goldnar úr landskassanum, við á løgtingsfíggjarlógini.

Nú verður heildarveitingin eins og endurgjaldið úr danska statskassanum bókað sum inntøka, og allar útreiðslurnar á útreiðslusíðuni.

Soleiðis at nú sæst, hvat førcyska samfelagið kostar.

Á fíggjarlógaruppskotinum 1989 kemur politikkur samgongunnar rættiliga til sjóndar.

At umskipa danska stuðulin var eitt av málum samgongunnar.

Somuleiðis at bøta um viðurskiftini á almannaøkinum, og her eru lógir samtyktar um hægri pensión, longri barnsburðarfrí, barnastyrk o.s.fr., somuleiðis eru lunnar lagdir undir fleiri smá heim eins og framvegis hevur verið arbeitt við at betra røktar- og ansingarheim.

Eisini sæst nú aftur á fíggjarlógini, at arbeiðið við at bøta og spjaða umsitingina hevur gjørt mun, t.d. landsbanki, líkningarráðið, arbeiðseftirlitið, tolldeildir.

Á skúlaøkinum sæst rættiliga politikkur landsstýrisins at styrkja um vinnuskúlarnar, so tað ikki bert er studenta- og HF-útbúgvingin til tey ungu, sum skulu hava hægri útbúgving. Útbúgvingarstyrkurin er hækkaður og okkara móðurmál og søga hava fingið betri kor.

Eisini er á uppskotinum til fíggjarløgtingslógina fyri 1989 sum árini frammanundan í hesum valskeiði lagdur nógvur peningur í ymsar grunnar, eins og peningur er lagdur av til íløgur á sjúkrahúsøkinum, skúlaøkinum, almannaøkinum og til landsverkfrøðingin.

Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna er hækkað í ár. Meðan ikki er neyðugt at leggja so nógvan pening av til grunn til endurnýggjing av fiskiskipaflotanum.

Fyri tað fyrsta er væl av peningi í grunninum, og ikki verða so nógv skip bygd longur, og stuðulin til skipabyggjing er minkaður sambært tær lógir, ið samtyktar vórðu í løgtinginum í vár.

Skotið er upp, at upphøggingargrunnurin fær 25 mió. kr. í 1989. Herumframt liggur uppskot í tinginum um at lána 30 mió. kr. úr oljugrunninum til upphøggingargrunnin. Á fíggjarlógini 1988 fekk grunnurin 40 mió. kr.

Tað hevur verið politikkur landsstýrisins at fíggja mest møguligt yvir fíggjarlógina fyri at sleppa undan lántøku eins og neyðugt er at budgettera á ein slíkan hátt, at gjaldføri landskassans er í lagi.

Hesin politikkur sæst aftur soleiðis, at landskassin hevur verið førur fyri at rinda hvørjum sítt til tíðina.

Landskassin hevur eisini verið førur fyri at rinda stórar partar av landskassaskuldini, og hevur klárað at greitt sínar skyldur hesi seinastu árini, nú ovurhonds stór veðhald eru vorðin effektiv, og samstundis hevur verið pláss fyri meginpartinum av teim nýggju tiltøkum, sum samgongan setti sær fyri at loysa í hesum valskeiði.

Ov nógv er ikki sagt, at landsstýrið í hesum valskeiði hevur fingið munandi betri skil á landskassabúskapinum.

Ásannast má kortini, at enn er ikki komið hagar til, at neyðuga samskipanin av búskaparstýringini av privatum, kommunalum, peningastovna og almennum virksemi er framd. Sam-

stundis má ásannast, at alt skiftir so skjótt og okkara samfelag er viðbrekið mótvegis broytingum í búskaparviðurskiftunum uttan um okkum.

Við fyriliggjandi uppskoti til figgjarlóg heldur landsstýrið, at sterkur karmur er lagdur um eitt samskipað virksemi í árinum 1989.

FØROYA LANDSSTÝRI, 1. september 1988

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/
/

Jalgrim Hilduberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11000. Telex 81235 (innl. fx.). Telefax 14941. Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

31. oktober 1988

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 2371-1

RJ/PP

Føroya Løgting.

Løtingsmál nr. 13/1988: Løtingslóg um útbúgvingarstuðul.

U p p s k o t

til

Løtingslóg um útbúgvingarstuðul.

Løgtingslov om uddannelsesstøtte.

Kapitul 1
Stuðulsskipanir og upphæddir.

Kapitel 1
Støtteformer og støttebeløb

§ 1.

Stuðulsstovnurin veitir útbúgvingarstuðul sum lestrarstudning og lestrarlán.

§ 1.

Stipendiekontoret giver uddannelsesstøtte til uddannelsessøgende i form af stipendium og studielån.

§ 2.

Í einum stuðulsári kann tann, ið er undir útbúgving í mesta lagi fáa fylgjandi lestrarstudning:

1) heimabúgvandi:
undir 18 ár kr. 8.000

§ 2.

For et helt støtteår kan den uddannelsessøgende højst få følgende beløb i stipendium:

1) hjemmeboende:
under 18 år kr. 8.000

yvir 18 ár kr. 18.000
2) útibúgvandi:
undir 18 ár kr. 18.000
yvir 18 ár kr. 28.000

Stk. 2. Tann, ið er í útbúgving, og sum er 18 ár og eldri, kann í einum stuðulsári fáa lestrarlán úr landskassanum upp til 15.000 kr.

Stk. 3. Stuðulsárið er frá 1. august til 31. juli.

Stk. 4. Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri:

a) hvørjar ungdómsútbugvingar ið geva rætt til stuðul.
b) nærri treytir fyri stuðul til hægri útbúgvingar.
c) um útroknan av stuðuli fyri styttri tíðarskeið enn eitt ár.
d) um treytirnar fyri at vera roknaður sum heimabúgvandi og útibúgvandi.
e) stuðulstíðina.

§ 3.

Tær í § 2 umrøddu upphæddir, verða prístalsviðgjørdar við grundarlagi í prístalinum fyri januar mánaða undan hvørjum stuðulsári.

over 18 år kr. 18.000
2) udeboende:
under 18 år kr. 18.000
over 18 år kr. 28.000

Stk. 2. Den uddannelsessøgende, der er fyldt 18 år, kan for et helt støtteår få et studielån fra landskassen på højst 15.000 kr.

Stk. 3. Støtteåret går fra 1. august til 31. juli.

Stk. 4. Stipendiekontoret kan fastsætte regler om:

a) hvilke ungdomsuddannelser der berettiger til støtte.
b) nærmere betingelser for støtte til videregående uddannelser.
c) om beregning af støtte for mindre end 1 år.
d) om betingelser for at være hjemmeboende og udeboende.
e) støttetiden.

§ 3.

De i § 2 nævnte beløb reguleres på grundlag af pristallet for januar måned forud for hvert støtteår.

Kapitul 2
Stuðulstreytir

§ 4.

Stuðulsstovnurin veitir sambært umsókn útbúgvingarstuðul til fólk í útbúgving sum:

1) eru í einari útbúgving í Føroyum, sum av stuðulsstovninum er stuðulsheimilað smb. kunngerð.
2) eru føroyingar ella sum sambært altjóða sáttmála hava rætt til útbúgvingarstuðul á jøvnum føti við føroyingar ella sum av stuðulsstovninum í sambandi við stuðulsveitingina verða javnsett við føroyingar
3) eru lestravirkin í Føroyum og
4) ikki fáa annan almennan stuðul, ið er ætlaður til at gjalda livikostnað.

Stk. 2. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur fyri útbúgvingarstuðuli til fólk í útbúgving, ið fáa aðra almenna hjálp og kann í hesum sambandi áseta, at hesi ikki kunnu fáa lestrarlán.

Kapitel 2
Støttebetingelser

§ 4.

Stipendiekontoret giver efter ansøgning uddannelsesstøtte til uddannelsessøgende, som:

1) på Færøerne gennemgår en uddannelse, der af stipendiekontoret er godkendt som støtteberettiget iht. bekendtgørelse.
2) er færinger eller i henhold til international overenstkomst har ret til uddannelsesstøtte på lige fod med færinger eller som af stipendiekontoret i støttemæssig henseende ligestilles med færinger.
3) er studieaktive på Færøerne.
4) ikke får anden offentlig støtte, der tilsigter at dække leveomkostningerne.

Stk. 2. Stipendiekontoret kan fastsætte regler om uddannelsesstøtte til uddannelsessøgende, der får anden offentlig hjælp, og kan herunder bestemme, at de ikke kan få studielån.

Kapitul 3
Fyribils og endaligar stuðulsupphæddir

§ 5.

Stuðulsstovnurin veitir lestrarstudning og lestrarlán í stuðulsárinum sum fyribils upphæddir, sum fyri tann einstaka so vítt møguligt skulu svara til tær upphæddirnar, ið viðkomandi hevur rætt til, tá ið stuðulsárið er úti.

Stk. 2. Útgjaldan av fyribils upphæddum í stuðulsárinum verða framdar út frá upplýsingum um lestrarviðurskifti, annan almennan stuðul o.a. Stuðulsstovnurin ásetir reglur um hetta.

Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann steðga ella broyta útgjaldan av fyribils upphæddum, um broytingar henda í stuðulsárinum í viðurskiftum, ið kunnu fáa munandi ávirkan á stuðuls veitingina. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um hetta.

Stk. 4. Fyribils upphæddir, ið eru goldnar fyri mánaðir har stuðulsmóttakarin ikki lýkur stuðulstreytirnar, kunnu verða kravdar aftur, áðrenn tann endaliga veitingin av útbúgvingarstuðulinum smb. § 6 verður framd.

Kapitel 3
Foreløbigt og endeligt støttebeløb

§ 5.

Støttekontoret udbetaler stipendium og studielån i støtteåret med foreløbige beløb, der for den enkelte så vidt muligt skal svare til de beløb vedkommende er berettiget til efter støtteårets afslutning.

Stk. 2. Udbetaling af foreløbige beløb i støtteåret sker på grundlag af oplysninger om studieforhold, anden offentlig støtte m.v. Stipendiekontoret fastsætter regler herom.

Stk. 3. Stipendiekontoret kan standse eller ændre udbetalingen af de foreløbige beløb, hvis der i løbet af støtteåret sker ændringer i forhold, der kan få væsentlig betydning for støttetildelingen. Stipendiekontoret kan fastsætte regler herom.

Stk. 4. Foreløbige beløb, der er udbetalt for måneder, hvor modtageren af uddannelsesstøtte ikke opfylder støttebetingelserne, kan kræves tilbagebetalt, før den endelige tildeling i henhold til § 6 finder sted. Stipendiekon-

Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um hetta.

§ 6.

Endaliga veitingin av lestrarstudningi og lestraláni verður framd, tá ið stuðulsárið er úti. Um stuðulstreytirnar smb. § 4 ikki hava verið loknar í stuðulsárinum, verður stuðulsupphæddin sett niður lutfalsliga.

Stk. 2. Útgoldnar fyribils upphæddir, ið ikki endaliga kunnu veitast sum lestrarstudningur og lestrarlán smb. stk. 1, skulu gjaldast aftur.

Stk. 3. Tá stuðulsárið er úti, skal tann, ið er í útbúgving og sum hevur tikið ímóti upphæddum í stuðulsárinum, geva allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri ta endaligu stuðulsveitingina.

Stk. 4. Lýkur tann, ið er í útbúgving ikki upplýsingarskylduna smb. stk. 3., verða tær útgoldnu fyribils upphæddirnar kravdar aftur. Kravið kann tó heilt ella partvíst falla burtur, um tann, ið er í útbúgving, kortini gevur upplýsingarnar, og um tað av teimum er greitt, at upphæddirnar

kontoret kan fastsætte regler herom.

§ 6.

Tildeling af stipendium og studielån sker endeligt efter støtteårets afslutning. Hvis støttebetingelserne i henhold til § 4 ikke har været til stede i støtteåret, nedsættes støttebeløbet forholdsmæssigt.

Stk. 2. Udbetalte foreløbige beløb, der ikke endeligt kan tildeles som stipendium og studielån, jr. stk. 1, skal tilbagebetales.

Stk. 3. Ved støtteårets afslutning skal den uddannelsessøgende, som har modtaget beløb i støtteåret, meddele alle oplysninger, der er nødvendige for den endelige støttetildeling.

Stk. 4. Opfylder den uddannelsessøgende ikke oplysningspligten efter stk. 3, kræves de udbetalte foreløbige beløb tilbagebetalt. Kravet kan dog frafaldes helt eller delvis, hvis den uddannelsessøgende alligevel meddeler oplysningerne og det fremgår, at beløbene kan tildeles efter stk. 1.

kunnu veitast smb. stk. 1.

Kapitul 4
Rentan og afturrindan av lestrarláni.

§ 7.

Endaligt veitt lestrarlán smb. § 6 stk. 1 verður at renta frá tí 1. í mánaðanum aftaná at tað er útgoldið. Í útbúgvingartíðini verður skuldin til eina og hvørja tíð at renta árliga við 3% niðanfyri ta til ein hvørja tíð galdandi diskonto. Síðani rentar upphæddin til eina og hvørja tíð árliga við 1% omanfyri diskontoina. Stuðulsstovnurin ásetur reglur um útbúgvingar tíðina, um hvørjar fylgjur steðgur í útbúgvingini hevur og um skyldu lántakaranna at geva upplýsingar um hetta.

Stk. 2. Afturrindan av lestrarláni, eisini afturrindan av rentum, skal vanliga byrja 1 ár aftaná at tað stuðulsárið er úti, har ið útbúgvingin er lokin. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um afturrindan av lestrarlánum.

Kapitel 4
Forretning og tilbagebetaling af studielån.

§ 7.

Endeligt tildelte studielån, jfr. § 6, stk. 1, forrentes med virkning fra den 1. i måneden efter udbetalingstidspunktet. I uddannelsestiden forrentes gælden til enhver tid med årligt 3% under den tilenhver tid fastsatte officielle diskonto. Derefter forrentes gælden til enhver tid med årligt 1% over diskontoen. Stipendiekontoret fastsætter regler om uddannelsestiden, herunder hvilke følger afbydelse i uddannelsen får, og om låntagers pligt til at give meddelelse herom.

Stk. 2. Tilbagebetalingen af studielån, herunder tilbagebetaling af renter, skal normalt begynde 1 år efter udløbet af det støtteår, hvori uddannelsen er afsluttet. Stipendiekontoret kan fastsætte regler om tilbagebetaling af studielån.

§ 8.

Um lántakarin ikki lýkur

§ 8.

Hvis låntageren ikke

lánitreytirnar kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan.
Stk. 2. Krav smb. stk. 1 verða fyrisitin av stuðulsstovninum, ið innkrevur skuldina.
Stk. 3. Stuðulsstovnurin ásetur rentu- og afturgjaldstreytir fyri mishildin lestrarlán.

Kapitul 5
fyrisiting, kærumøguleiki o.a.

§ 9.

Stuðulsstovnurin fyrisitur útbúgvingarstuðulin. Føroya Landsstýri ásetur nærri reglur fyri stovnin.
Stk. 2. Stuðulsstovnurin fær heimild til at fáa tær upplýsingar um tann einstaka umsøkjaran frá almennum myndugleikum, ið eru neyðugar fyri at útrokna stuðulin.
Stk. 3. Stuðulsstovnurin kann áseta reglur um innihald og uppsetan av umsóknum, lániskjølum o.ø., um útgjalding av stuðuli, um hvørjar upplýsingar, ið kunnu krevjast skrivligt og um freistir fyri umsóknir, inngjaldingar og fráboðanir.

overholder lånets vilkår, kan gælden opsiges til skadesløs betaling.
Stk. 2. Krav efter stk. 1 administreres af stipendiekontoret, som søger det inddrevet hos låntagerne.
Stk. 3. Stipendiekontoret fastsætter rente- og tilbagebetalingsvilkår for misligholdte studielån.

Kapitel 5
Administration, klageadgang m.v.

§ 9.

Uddannelsesstøtten administreres af stipendiekontoret. Færøernes Landsstyre fastsætter nærmere regler for stipendiekontoret.
Stk. 2. Stipendiekontoret får hjemmel til hos andre offentlige myndigheder at indhente de oplysninger om den uddannelsessøgende, der er nødvendige for beregningen af støtten.
Stk. 3. Stipendiekontoret kan fastsætte regler om indhold og udformning af ansøgninger, lånedokumenter m.v., om udbetaling af støtte, hvilke oplysninger der kan kræves skriftligt, samt om frister for ansøgninger, for indbetalinger og for meddelelser.

Stk. 4. Fólk í útbúgving skulu geva upp navn, bústað og persóntal, tá ið søkt verður um stuðul og tá ið tey annars venda sær til stuðulsstovnin.

§ 10.

Landsstýrið kann avgerða, at stuðulsstovnurin skal fyrisitast saman við ella av øðrum almennum stovni.

§ 11.

Avgerðir tiknar av stuðulsstovninum um:

1) grundarlagið fyri veitan og útroknan av stuðuli til fólk í útbúgving og
2) at ein stuðulstakari skal afturrinda stuðul

kunnu áðrenn 6 vikur eru gingnar, eftir at boðað er frá avgerðunum, kærast til kærunevndina hjá stuðulsstovninum av tí, ið avgerðin viðvíkur. Avgerð kærunevndarinnar er endalig innan fyrisitingina.

Stk. 2. Landsstýrið setir kærunevnd við 3 limum. Formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða settir fyri 4 ár í senn. Lands-

Stk. 4. Den uddannelsessøgende skal oplyse navn, adresse og personnummer ved ansøgning om uddannelsesstøtte og ved henvendelse i øvrigt til stipendiekontoret.

§ 10.

Landsstyret kan træffe afgørelse om at stipendiekontoret skal administreres sammen med eller af anden offentlig myndighed.

§ 11.

Afgørelser truffet af stipendiekontoret om:

1) grundlaget for tildeling og beregning af støtte til en uddannelsessøgende og
2) at en støttemodtager skal tilbagebetale støtte

kan inden 6 uger efter meddelelsen om afgørelsen indbringes for ankenævnet for uddannelsesstøtten af den, som afgørelsen vedrører. Ankenævnet træffer den endelige administrative afgørelse.

Stk. 2. Landsstyret nedsætter et ankenævn med 3 medlemmer. Formanden skal være jurist. Medlemmerne bliver udnævnt for 4 år ad

stýrið kann áseta reglugerð fyri kærunevndina.

§ 12.

Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri almennan útbúgvingarstuðul, ið ikki kemur undir hesa lóg.
Stk. 2. Stuðulsstovnurin fyrisitur almennan útbúgvingarstuðul, ið ikki kemur undir hesa lóg.

§ 13.

Lógin kemur í gildi tann 1. august 1988.

gangen. Landsstyret kan fastsætte regler for ankenævnet.

§ 12.

Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for offentlig uddannelsesstøtte der ikke er omfattet af denne lov.
Stk. 2. Stipendiekontoret administrerer offentlig uddannelsesstøtte, der ikke er omfattet af denne lov.

§ 13.

Loven træder i kraft den 1. august 1988.

Viðmerkingar:

Føroyingar undir útbúgving í Føroyum hava higartil fingið stuðul og lán úr Danmark eftir har galdandi reglum um "uddannelsesstøtte".

Í samband við, at stuðulin frá "Statens uddannelsesstøtte" er lagdur um (1. januar 1988) til blokkstuðul og sostatt skal fyrisitast í Føroyum, er gjørd ein lóg á økinum.

Donsku reglurnar eru broyttar í 1988, fyrst og fremst fyri at taka burtur tey dýru bankalánini ("statsgaranterede studielån"), sum lesandi í vissan mun hava verið noydd at tikið.

Føroyska lógin byggir á sama sjónarmið og veitir útbúgvingarstuðul, sum lestrarstudning & lestrarlán.

Hesi lánini eru bilig, t.v.s. fólk í útbúgving, ið eru fylt 18 ár (§ 2, 2. stk.) kunnu fáa upp til 15.000 kr. í lestrarláni árliga. Rentan verður árliga 3% undir diskontoina í lestrartíðini og 1% yvir diskontoina eftir lokna útbúgving.

Í Føroyum hava fólk í útbúgving rætt til hesar studningsupphæddir:

Útibúgvandi árliga í mesta lagi.....28.000,00 kr.
Heimabúgvandi -- - -- -- .....18.000,00 kr.

Í Danmark hava fólk í útbúgving rætt til hesar upphæddir:

Útibúgvandi árliga í mesta lagi.....36.000,00 kr.
Heimabúgvandi -- - -- -- .....22.000,00 kr.

Tær føroysku studningsupphæddirnar eru eitt sindur minni enn tær donsku, men her skal viðmerkjast, at studningsupphæddir í Danmark eru skattaskyldug inntøka, meðan studningsupphæddir í Føroyum eru skattafríar.

Føroyingar undir útbúgving í Danmark og øðrum londum fara framvegis at fáa stuðul smbr. donsku lógini um "uddannelsesstøtte".

Føroya Landsstýri hevur árliga latið limum í MFS ("Meginfelag føroyska Studenta"), ið fevnir um lesandi á hægri lærustovnum 4.500,00 kr. í stuðuli og 4.500,00 kr. í láni, rentufrítt í lestrartíðini.

Limir í LFÚ (Landsfelag føroyinga undir útbúgving) hava úr landskassanum árliga fingið kr. 4.000,00 í stuðli.

Umframt hesar skipanir hevur Føroya Landsstýri veitt stuðul eftir meting í hvørjum einstøkum føri t.d. um aðrir stuðulsmøguleikar ikki finnast ella almennar umstøður annars tala fyri hesum.

Tann føroyskt veitti stuðulin er komin úr "Útbúgvingargrunninum", sum á fíggjarlógini 1988 fekk játtaðar 15. mió. kr.

Eftir at henda lóg er komin í gildi, fellur núgaldandi skipan burtur og lesandi fáa stuðul sambært hesi lóg, í tann mun tey hava rætt til tess .

Føroyingar uttanlands fáa somu upphæddir sum higartil. Hesin stuðul verður nevndur "ferðaískoyti".

Í samband við at lógin skal fyrisitast, og at reglugerð verður gjørd um útbúgvingarstuðulin, sum ikki verður veittur smb. hesi lóg, verður neyðugt at ein sjálvstøðugur stovnur fyrisitur hesi málsøki.

Mett verður, at uml. 4000 umsóknir skulu avgreiðast árliga. Tí verður neyðugt at seta fólk til at røkja hesa uppgávu og er tikin hædd fyri hesum á fíggjarlógini fyri 1989.

Smb. lógini § 10 fær Føroya Landsstýri heimild til at avgera, at stuðulsstovnurin skal fyrisitast saman við ella av øðrum almennum stovni.

Kostnaður:

Mett verður, at henda stuðulsskipan, við teimum upphæddum nevndar eru í lógini, fer at kosta uml. 25 mió. kr.

Treytin fyri hesum er sjálvsagt, at tær metingar ið gjørdar eru, fara at halda.

Ein týðandi fortreyt er, at lánimøguleikarnir framvegis verða nýttir í sama mun eftir føroysku skipanini, sum eftir fyrrverandi skipan.

Harafturat verður mett, at uml. 7 mió. kr. fara at verða veittar føroyingum undir útbúgving uttanfyri Føroyar ("ferðaiskoyti").

Jógvan Durhuus
landsstýrismaður

/

/Jalgrím Hilduberg

Á l i t

1

Løgtingsmáli nr. 13 /1988: Løgtingslóg um útbúgvingarstuðul.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1988 og var eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í mentannar og skúlanevndina.

Uppskotið er ein fylgja av lógini um heildarveiting, ið kom í gildi 1. januar 1988. Eftir hesi lóg skal stuðulin frá "Statens Uddannelsesstøtte" fyrisitast í Føroyum. Lógaruppskotið fylgir í stóran mun teim donsku sjónarmiðunum, og verður útbúgvingarstuðulin veittur partvíst sum beinleiðis studningur og partvíst sum lestrarlán. Skotið verður upp, at lænast kann í mesta lagi 15.000 kr. árliga, og verður rentan sett til 3% undir diskontoina í lestrartíðini og 1% yvir diskontoina eftir lokna útbúgving.

Viðvíkjandi sjálvum studningsupphæddunum, so verða veitingarnar eftir uppskotinum nakað minni enn tær tilsvarandi donsku studningsupphæddirnar, og kemur hetta av, at studningsupphæddirnar í Danmark eru skattskyldug inntøka, meðan studningsupphæddir í Føroyum eru skattafríar.

Tær í lógaruppskotinum nevndu upphæddir eru fylgjandi:

Heimabúgvandi undir 18 ár eiga at fáa 8.000 kr. árliga - yvir 18 ár 18.000 kr.

Útibúgvandi undir 18 ár eiga at fáa 18.000 kr. - yvir 18 ár 28.000 kr.

Løgtingsins skúla og mentannarnevnd hevur frá Landsfelag føroyinga í útbúgving í skrivi dagfest 2. september 1988 fingið áheitan um at hækka studningsupphæddina fyri heima- og útibúgvandi yvir 18 ár til ávikavist 32.000 kr. og 22.000 kr. Hesar eru upphæddirnar, sum LFÚ metir, at tey lesandi eftir

nýggju donsku skipanini vildu havt eftir aftaná skatt.

Samd nevnd tekur sum heild undir við uppskotinum. Nevndin heldur, at LFÚ kann hava grein í sínum máli og mælir til at ganga LFÚ partvíst á møti. Viðvíkjandi lestrarlánum heldur nevndin tað ikki vera beint, at tey lesandi skulu gjalda rentur í útbúgvingartíðini. Nevndin mælir tí til hesar broytingar og setir samsvarandi hesum fram:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) § 2, 1. stk. í uppskoti landsstýrisins verður soljóðandi:

"Í einum stuðulsári kann tann, ið er í útbúgving í mesta lagi fáa fylgjandi lestrarstudning:

1) Heimabúgvandi:
   undir 18 ár kr. 8.000
   yvir 18 ár kr. 19.000
2) Útibúgvandi:
   undir 18 ár kr. 18.000
   yvir 18 ár kr. 29.000"

1) § 2, stk. 1 i landsstyrets forslag formuleres således:

"For et helt støtteår kan den uddannelsessøgende højst få følgende beløb i stipendinum:

1) Hjemmeboende:
   under 18 år kr. 8.000
   over 18 år kr. 19.000
2) Udeboende:
   under 18 år kr. 18.000
   over 18 år kr. 29.000"

2) § 7, 1. stk., í uppskoti landsstýrisins verður soljóðandi:

"Endaligt veitt lestrarlán smbr. § 6, 1. stk., verður rentufrítt í normeraðu útbúgvingartíðini. Síðani rentar upphæddin til eina og hvørja tíð árliga við 1% omanfyri diskontoina. Stuðulsstovnurin ásetir reglur um útbúgvingartíðina, um hvørjar fylgjur steðgur í útbúgvingini hevur, og um skyldu lántakaranna at geva upplýsingar um hetta."

2) § 7, stk. 1 i landsstyrets forslag formuleres således:

"Endeligt tildelte studielån, jfr. § 6, stk. 1 forbliver rentefrit i den normerede uddannelsestiden. Derefter forrentes gælden til enhver tid med årligt 1% over diskontoen. Stipendiekontoret fastsætter regler om uddannelsestiden, herunder hvilke følger afbrydelse i uddannelsen er afsluttet. Stipendiekontoret kan fastsætte regler om tilbagebetaling af studielån."

Nevndin mælir annars løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við frammanfyri standandi broytingum.

Nevndin tekur undir við uppskotinum, men heitir á landsstýrið um at vísa serligt atlit móti føroyingum í útbúgving, sum vilja lesa og læra uttan fyri Norðurlond, tá lóg og regluger verður gjørd fyri stuðul til útbúgving uttanlands, har eingin serskipan er galdandi sum er.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, . september 1988.

Jóannes Dalsgaard Hergeir Nielsen Asbjørn Joensen

Eilif Samuelsen Óli Breckmann

SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 14/1987: Broyting í fólkatingsvallógini.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur spurningin um umboð okkara í fólkatinginum til viðgerðar.

Viðmerkingar:

Sambært § 28 í grundlógini skulu vit føroyingar velja 2 umboð í fólkatingið. Sambært § 31 skulu hesi okkara umboð veljast við fólkaatkvøðu. Sama er galdandi fyri grønlendsku umboðini, men sambært somu grein kunnu við lóg ásetast serligar reglur um val av grønlendsku umboðunum. Hetta er ikki galdandi fyri føroysku umboðini.

Nú frambongur av blaðskriving í Danmark, at møguleiki er fyri, at uppskot um at broyta grundlógina kemur upp í fólkatinginum til heystar. Tað er m.a. reglan um, at forsætismálaráðharrin kann skriva út val í úrtíð, sum ávisir politikkarar vilja hava broytta. Tí er vert hjá okkum at liggja fram við og koma við okkara ynskjum um broytingar í so góðari tíð, at hesi kunnu koma við í eini møguligari nevndarviðgerð.

Spurningurin um okkara umboð í fólkatinginum hevur verið til viðgerðar í løgtinginum áður.

Í 1965 legði táverandi løgmaður fyri hina sonevndu sjálvstýrissamgonguna uppskot á ting um at broyta heimastýrislógina, sum m.a. bar við sær, at okkara umboð í fólkatinginum

skuldu takast av. Uppskotið fekk ikki undirtøku.

Í 1973 legði Sjálvstýrisflokkurin uppskot á ting um at seta á stovn føroyska umboðsstovu í Keypmannahavn. Sjálvt um tað ikki framgekk bínleiðis av uppskotinum, so mundi ætlanin helst vera, at henda umboðsstova skuldi koma í staðin fyri okkara umboð í fólkatinginum. Hetta mál fekk heldur ikki undirtøku.

Nú møguleiki tykist vera fyri, at grundlógin verður endurskoðað, man stundin vera komin, at løgtingið aftur tekur málið um fólkatingsumboðanina til viðgerðar. Mikið ríkiligt, at viðgerðin fer fram í ár, 40 ár eftir at vit fingu heimastýri og 100 ár aftaná hin tiltikna fólafundin.

Tingið eigur tí at umhugsa aðra skipan, tað veri seg umboð á fólkating við talurætti uttan atkvøðurætt. Umboðið verður knýtt at føroyskari umboðsstovu.

Onnur loysnin er hon, at løgtingið velur umboðini, ávikavist úr samgongu og andstøðu. Best um hesi bert høvdu talurætt uttan atkvøðurætt.

Slík skipan hevði sloppið okkum undan teim mongu donsku valunum, ið verið hava í úrtíð, eisini er at hava í hugsa, at vit hava valskyldu til tvey lóggávuting.

Á FØROYA LØGTINGI, 31. august 1998.

Asbjørn Joensen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 14/1988: Broyting í fólkatingsvallógini.

Málið er lagt fram av 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í rættarnevndina.

Uppskot Sjálvstýrisfloksins mælir løgtinginum til at taka spurningin um umboð okkara í fólkatinginum til viðgerðar.

Í uppskotinum verður m.a. víst á, at nú møguleiki tykist vera fyri, at grundlógin verður endurskoðað, eigur løgtingið at taka málið um fólkatingsumboðanina til viðgerðar. Tingið eigur at umhugsa aðrar skipanir, sum t.d. at vit framvegis hava umboð á fólkatingi við talurætti, men uttan atkvøðurætt. Umboðið verður knýtt at føroyskari umboðsstovu. Somuleiðis verður møguleikin nevndur, at løgtingið velur umboðini, ávikavist úr samgongu og andstøðu.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Ingrið Sondum og Jógvan Sundstein) setir í staðin fyri uppskot sjálvstýrisfloksins fram hetta

I U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at boða stjórnini frá, at tað ynskir fólkatingsumboðanina avtikna, tá ið grundlógin verður

broytt næstu ferð.

Ein annar minniluti (Jákup Lindenskov og Eilif Samuelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein triði minniluti(Jóannes Dalsgaard) heldur tíðina nú verða komna til at umskipa fólkatingsumboðanina og setir tí fram hetta

II U p p s k o t

til

samtyktar

1. Løgtingið samtykkir, at næstu ferð grundlógin verður broytt verður fólkatingsumboðan Føroya umskipað soleiðis, at føroysku fólkatingslimirnir ikki í framtíðini hava arkvøðurætt.
2. Álagt verður landsstýrinum at boða stýrinum frá hesum.

RÆTTARNEVNDIN, 5. september 1988.

Ingrið Sondum Jóannes Dalsgaard Jákup Lindenskov

Jógvan Sundstein Eilif Samuelsen

B r o y t i n g a r u p p s k o t

<u>í løgtingsmáli nr. 14/1988: Broyting í fólkatingsvallógini.</u>

Í álitinum verður í 1. stk. í uppskotinum hjá minnilutanum Jóannes Dalsgaard sett aftur at: "og verða valdir av løgtinginum".

Á FØROYA LØGTINGI, 6. september 1988.

Hilmar Kass

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

1. september 1988

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 451-1

Tlf. 11000 . Telex 81235 tinghs fa . Telefax 14943 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

RJ/PP

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 15/1988: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um ferðagjald

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðagjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um ferðagjald verður § 3 orðað soljóðandi:

"Avgjald skal ikki latast fyri:

1. børn undir 12 og 16 ár við flutningi ávikavist loftvegis og sjóvegis,
2) ferðafólk, ið eru í Føroyum í transitt,
3) ferðafólk, ið ferðast við fari, sum ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning, smb. § 1, stk. 2."

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om rejseafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 11. maj 1988 om rejseafgift affattes § 3 således:

"Afgift skal ikke betales for:

1) børn under 12 og 16 år ved befordring ad luftvejen henholdsvis søvejen,
2) rejsende, som er på Færøerne i transit og
3) rejsende med et fartøj, som ikke sædvanligvis benyttes til passagertransport, jfr. § 1, stk. 2."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

14. apríl 1987 varð løgtingslóg nr. 23 um ferðaavgjald samtykt á Føroya Løgtingi.

Sambært hesi lóg kundi gjaldið, ið hin ferðandi skuldi gjalda við fráferð úr Føroyum eftir avtalu við flutningsfyritøkuna krevjast sum eitt meðalgjald.

Tað vísti seg eftir lógarviðtøkuna, at onkur flutningsfyritøka ikki vildi samstarva við Føroya Landsstýri.

Hetta førdi við sær, at neyðugt var við nýggjari lóg um ferðaavgjald, og varð henda samtykt á Føroya Løgtingi 7. mai 1988.

Sambært hesi lóg skuldi hvør einstøk flutningsfyritøka hava ábyrgdina fyri at ferðaavgjaldið varð goldið.

Tað vísir seg nú, at flutningsfyritøkurnar eru vorðnar áhugaðar fyri at samstarva við Føroya Landsstýri um ferðaavgjaldið, men orsakað av at flutningsfyritøkurnar nýta ymisk aldursmark í hesum sambandi, er tað fyrisitingarliga sæð sera trupult at nýta sama aldursmark fyri allar fyritøkur. Tí verður tað skotið upp, at aldursmarkið verður sett til 12 ár við flutningi loftvegis og 16 ár við flutningi sjóvegis, og skuldi nú einki verið í vegin fyri, at allar flutningsfyritøkurnar kunnu uppkrevja gjaldið.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 15/1988: Løgtingslóg í broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um ferðagjald.

Málið er lagt fram av landsstýrinum 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í figgjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) mælir til at samtykja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) førir fram: Sambandsflokkurin hevur heilt frá byrjan verið í móti ásetingini av ferðagjaldinum. Minnilutin vísir til løgtingslóg nr. 10/1987, har sambandsflokkurin mælir til at avtaka ferðagjaldið. Hetta uppskot vann ikki fram tá, og vit ásanna at ferðaavgjaldið hevur verið okkum føroyingum til stóra skomm.

Minnilutin (Poul Michelsen) mælir til at lógin um ferðagjald verður avtikin.

Nevndu minnilutar seta sostatt fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðagjald.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om rejseafgift.
§ 1.	§ 1.
Løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um gjald fyri	Lagtingslov nr. 37 af 26. maj 1988 om afgift på

ferðing úr Føroyum verður sett gildi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

rejser fra Færøerne ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988.

Jørgen Thomsen Asbjørn Joensen Signar Hansen

Adolf V. Hansen Ivan Johannesen Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

29. august 1988

F. L. j. nr. 2207-4-2

Tlf. 11910 . Telex 81235 tinghs fo . Telefax 14942 . Postbox 64
Argreiðsluhetið: Kl. 10—15, leygardag stongt

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 16/1988: Avmarking av nýtsluni av freon.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um nýtslu av freon.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað í kunngerð at áseta reglur um bann móti innflutningi, sølu og nýtslu av íløtum við freon sum drívmegi.

§ 2. Brot á reglur, ásettar við heimild í hesi lóg, verða revsað við sekt og hald verður lagt á ólóglig innflutt íløt.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om anvendelse af freon.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte regler om forbud mod import, salg og anvendelse af beholdere med freon som drivmiddel.

§ 2. Overtrædelse af regler fastsat med hjemmel i denne lov straffes med bøde og ulovligt importerede beholdere konfiskeres.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Føroyingar eiga at vera við í fremstu røð, tá talan er um at verja umhvørvið - tað verið seg nær- ella fjarumhvørvið.

Og hóast okkara arbeiði mangan tykist at muna so lítið í alheimssamanheingi, so hevur tó landsstýrið gjørt eitt stórt arbeiði á umhvørvisøkinum. Nevnast kann umhvørvislógin, sum varð samtykt í vár, og arbeiðið ímóti ætlanini at byggja eitt kjarnorkuendurvinningarverk í Dounrey. Eisini hevur landsstýrið í størri mun luttikið í umhvørvisarbeiðinum hjá norðurlendska ministararáðnum og á millumlanda umhvørvisfundum, t.d. í London og Lissabon.

Seinasta vetur samtykti løgtingið, at Wien-sáttmálin um verju av ozonlagnum eisini skuldi galda í Føroyum.

Løgtingslógaruppskotið um nýtslu av freon, sum landsstýrið her leggur fyri tingið, heimilar landsstýrinum at áseta nærri reglur til avmarking av nýtsluni av freon, ið sum kunnugt er oyðileggjandi fyri ozonlagið í stratosferuni, ið hevur stóran týdning fyri lívið á jørðini, og týða tær seinastu vísindaligu kanningarnar uppá, at verri er statt enn áður hildið.

Ætlanin er beinanvegin at seta forboð móti nýtslu av spraydósum við freon til privata nýtslu, men arbeiðast má fram ímóti, at nýtslan yvirhøvur verður avmarkað so nógv, sum á nakran hátt gjørligt.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/
/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 16/1988: Avmarking av nýtsluni av freon.

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1988 og eftir í. viðgerð 2. september 1988 beint til viðgerðar í umhvørvisnevndina.

Endamálið við lógaruppskotinum er seta forboð móti nýtslum av spraydósum við freon til privata nýtslu í Føroyum.

Lógaruppskotið er ein fylgja av, at løgtingið samtykti Wien-sáttmálan um verju av ozonlagnum seinasta vetur.

Samstundis sum umvhørvisnevndin vísir á álit sítt í nevnda máli um Wien-sáttmálan, mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

UMHVØRVISNEVNDIN, 5. september 1988.

Jóannes Dalsgaard Øssur av Steinum Ingrid Sondum

Johannes Martin Olsen Anfinn Kallsberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11868 . Telex 81235 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

29. august 1988

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 1212-14-1

KK/rj

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 17/1988: Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn Íðnaðarins.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri íðnað, handverk og tænastufyritøkur.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri íðnað, handverk og tænastufyritøkur við seinni broytingum verður gjørd hesa broyting:

1) § 5 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrið ásetir í teirri í § 7 nevndu reglugerð, hvussu stórt lán, studningur og/ella veðhald kann verða veitt einstøkum virki uttan góðkenning frá landsstýrinum."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om udviklingsfond for industri, håndværk og udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder.

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973 om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder med senere ændringer foretages følgende ændring:

1) § 5 affattes således:
"Landsstyret fastsætter i vedtægten, jfr. § 7, hvor stort lån, tilskud og/eller garanti, der kan ydes en enkelt virksomhed uden landsstyrets godkendelse."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Av tí at serlig tiltøk mugu haldast neyðug fyri at fremja vinnuskapandi ilogur úti á utoyggjunum og í útjaðaraøkjum hava møguleikarnir fyri viðkan av virkisøki menningargrunsins ella stovnsetan av einum oyggjamenningargrunni verið kannaðir.

Kann virksemið, ið annars skuldi ligið í einum oyggjamenningargrunni, verða tikið eins væl við undir virksemið hjá menningargrunni íðnaðarins, so má tað haldast burturvið at seta nyggjan grunn á stovn.

Uttan mun til hvør loysn verður vald, fær hon valla avgerandi týdning fyri útjaðaramenningina.

Helst verður neyðugt við serligum, ymiskum tiltøkum á teimum einstøku plássunum, og roknast má eisini við, at tiltøkini hvørt sær hava fyri neyðini ymiskar heimildir og játtanir. Teir karmar, ið grunnar kunnu arbeiða innanfyri, vera uttan iva ov trongir.

Landsstýrið hevur valt ta loysnina at viðka um virkisøkið hjá menningargrunninum, men er saman við figgjarnevnd løgtingsins altíð til reiðar at stuðla serligum tiltøkum í útjaðaraøkinum, har menningargrunnurin og aðrir møguleikar vísa seg ikki at røkka.

Í samband við broytingina av viðtøkunum fyri menningargrunnin hava smávegis ajourføringar vist seg neyðugar, ið so samstundis eru tiknar við.

Ein teirra er, at eftir verandi lóg skal landsstýrið góðkenna lán uppá meira enn 500.000 kr. ella veðhald uppá meira enn 1 mió. kr. til einstakt virki.

Henda áseting var skilagoð, tá lógin upprunaliga kom í gildi og stovnsfæ grunsins var 4 mió. kr.

Seinni er hetta broytt til ávikavist 1,5 mió. kr. og 2 mió. kr.

Í dag ber ásetingin í sær, at næstan hvør einasta lánijáttan skal góðkennast av landsstýrinum.

Heldur enn at seta nýggja upphædd inn í lógina skjýtur landsstýrið upp, at tað ásetir og ajourførir støddirnar.

Eins og fyri Húsalánsgrunnin upprunaliga hevur lógin um menningargrunnin ongar reglur um fyrisiting. Tí skjýtur landsstýrið upp, at veruliga støðan verður orðað í lógini, soleiðis at dagliga umsitingin skal liggja hjá einum stjóra, settur av landsstýrinum.

Verður uppskotið um broyting av lógini um menningargrunnin samtykt, ætlar landsstýrið av praktiskum orsøkum at lýsa ajourførdu viðtøkurnar í sini heild samstundis sum lógarbroytingin verður kunngjørd.

Hervið verður ikki so fløkt at finna fram til galdandi ásetingar. Ájourførdu viðtøkurnar eru settar aftana hesar viðmerkingar, og í mun til upprunaligu viðtøkurnar eru broytingar gjørdar í § 2, b), § 3, § 4, 5., 6., 7., og 8. stk., § 8, 2. stk., § 12, 2. og 3. stk., § 13, 1., 3., 5., 10., 11., 12., 13., 14. og 15. stk., og í § 14.

Landsstýrið metir, at nú privatu peningastovnarnir fara at taka sær meira av at veita rakstrarlán, tá menningargrunnurin hevur verið nakað einsamallur um, fer menningargrunnurin helst ikki at tørva eyka játtan ella lánsheimildir fyri at stuðla útjaðarøkjunum sbrt. viðkaðu heimildirnar.

Vísir hetta seg kortini neyðugt, vil landsstýrið leggja uppskot um slíka eykajáttan ella lánsheimild fyri løgtingið.

Vilhelm Johannesen
landsstýrismaður

/

Kjartan Hoydal

KUNNGERÐ

Eftir § 7 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um "Menningargrunn fyri idnað, handverk og tænastufyritøkur" við seinni broytingum hevur landsstýrið fyriskipað soljóðandi.

Viðtøkur fyri "Menningargrunn Idnaðarins".

§ 1.

Menningargrunnur idnaðarins, sum er stovnaður sambært løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973, hevur til endamáls at veita hjálp til fremjan av atgerðum, ið kunnu skapa bata fyri idnað, handverk og tænastufyritøkur.

2. stk. Stuðul frá grunninum kann vera veitan av:

a) uppbyggingarkreditti
b) útflutningskreditti ella útflutningsveðhaldi
c) rentustudningi
d) studningi til upplæring, gransking og vørumenning
e) hjálp til marknaðarkanningar, útflutningsstudning o.l.
f) hjálp til mennan á serligum støðum
g) lán og/ella studningi til ískoytisiløgu, figgjan og rakstur av nýstovnaðum virkjum og umskipan av verandi til broyttan marknað o.t.

§ 2.

Figgjarliga støðið undir grunninum er:

a) játtan uppá 4 milj. kr. úr landskassanum í figgjarárinum 1973/74. Annars tekur løgtingið á hvørjum ári støðu til játtanir til grunnin
b) heimild til lántøku við landskassaveðhaldi
c) rentuinntøkur
d) endurgoldin givin lán
e) 1 $^{0}/_{00}$-gjaldið sambært § 9
f) aðrar inntøkur.

§ 3.

Nevnd grunsins telur 3 limir og 3 tiltakslimir, og skulu teir hava góðan kunnleika til

ídnað.

2. stk. Ein nevndarlimur og ein tiltakslimur ganga út hvørt ár, fyrstu tvey árini við lutakasti. Fráfarnir nevndarlimir og tiltakslimir kunnu veljast aftur.

3. stk. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.

§ 4.

Nevndin er hægsti myndugleiki grunsins og hevur ábyrgd av virki grunsins.

2. stk. Nevndarformaðurin (um hann hevur forfall næstformaðurin) boðar við minst 7 daga freist til fundar, so ofta tørvur er á og við upplýsing um dagsskrá.

3. stk. Hevur hevndarlimur forfall, eigur hann um gjørligt áðrenn nevndarfundin at siga sína hugsan. Formaðurin ger so av, um umroddu mál skulu avgerast á fundinum ella útsetast til seinni fund.

4. stk. Nevndin er viðtøkufør, um tveir nevndarlimir eru møttir. Allar avgerðir verða tiknar við atkvøðumeiriluta.

5. stk. Dagliga umsitingin av grunninum liggur hjá stjóranum, sum verður tilnevndur av landsstýrinum eftir tilmæli frá nevndini.

6. stk. Stjórin setur starvsfólk, innanfyri tað starvsfólkatal og til tær lønir, sum landsstýrið góðkennir.

7. stk. Stjórin bindur grunnin við sinari undirskrivt. Til upptøku av láni krevst tó eisini undirskrivt av formanni ella tveimum nevndarlimum.

8. stk. Umsitingarútreiðslur grunsins eins og samsýning til nevndarlimir, ið skal góðkennast av landsstýrinum, verða goldnar av inntøkum grunsins.

§ 5.

Fundarfrágreiðingar verða førdar í gerðabók. Ein minniluti kann krevja sína støðu tikna við í gerðabókina.

2. stk. Fer atkvøða fram, verður úrslitið

skrivað í gerðabókina. Gerðabókin verður undirskrivað av teimum luttakandi nevndarlimunum.

§ 6.

Eingin nevndarlimur má luttaka í avgerð av máli, sum beinleiðis ella óbeinleiðis nemur við virki, har hann hevur áhugamál, ella virki, sum hann er bundin at.

2. stk. Hevur limur áhuga í ella er knýttur at virki, sum er til viðgerðar í nevndini, hevur hann skyldu til at siga formanninum frá, áðrenn málið kemur fyri.

3. stk. Er nevndin ósamd um áhugamálsspurningin, verður hann endaliga avgjørdur av landsstýrinum.

4. stk. Fæst ikki avgerð av máli orsakað av áhugamálsspurninginum verður málið skotið fyri landsstýrið til avgerðar.

§ 7.

Nevndarlimirnir hava tøgnskyldu mótvegis øllum, ið ikki varða av, um tað, sum teir í starvinum fáa kunnleika um.

§ 8.

Nevndin eigur at býta veitingar úr grunninum best møguligt millum ymiskar vinnugreinir.

Annars eigur nevndin at hava í huga at nøkva samvinnu við landsstýrið og ymsar stovnar til tess at samskipa heildarveitingarnar best møguligt.

2. stk. Nevndin hevur heimild til at søkja sær tekniskar og fíggjarligar upplýsingar hjá Búskaparráðnum, Føroya Iðnaðargrunni og Mentingarstovu landsins í samband við viðgerðina av umsóknum til Menningargrunnin.

§ 9.

Øll iðnaðarvirki, allar handverkarafyritøkur og tænastufyritøkur hava skyldu innan 1. januar 1974 og annars ikki seinni enn 2 mánaðar aftaná, at virkið ella fyritøkan er byrjað at melda seg til skráseting hjá grunninum.

2. stk. Øll tey virki og fyritøkur, ið nevnd er í 1. stk., skulu árliga lata 1 $^{0}/_{00}$ av sinum umsetningi til grunnin, fyrstu ferð fyri árið 1974. Gjaldið fellur til gjaldingar 1. apríl árið eftir.

Virkini og fyritøkurnar skulu árliga senda grunninum grannskoðaða roknskap sín innan 1. mars í eftirfylgjandi árinum, fyrstu ferð roknskapin fyri 1974 innan 1. mars 1975.

§ 10.

Virki, sum fáa stuðul úr grunninum, eru undir eftirliti av nevndini, soleingi stuðulin varar.

§ 11.

Fyri útlánum skal trygd veitast, sum nevnd grunnsins í hvørjum einstøkum føri skal góðkenna.

2. stk. Lán uppá meira enn 2 mió. kr. ella veðhald av lánum uppá meira enn 3 milj. kr. til einstakt virki krevur góðkenning frá landsstýrinum, sum í slíkum førum fær sær ummæli frá menningarstovu landsins.

3. stk. Studningsveitan uppá meira enn 500.000 kr. og íløgustudningur uppá meira enn 400.000 kr. til einstakt virki krevur góðkenning frá landsstýrinum, sum í slíkum føri fær sær ummæli frá menningarstovu landsins.

§ 12.

Av ti peningi, sum grunnurin hvørt ár hevur til taks, mugu samlaðu studningsveitingarnar ikki fara upp um 25 %.

§ 13.

Veitan av uppbyggingarkreditti, útflutningskreditti ella útflutningsveðhaldi má ikki fara upp um 70 % av goymslu- ella sáttmálavirðinum á viðkomandi vørum. Í serligum førum kann kreditturin ella veðhaldið vera upp til 90 % av virðinum á viðkomandi vørum.

Uppbyggingar- og útflutningskredittir og útflutningsveðhald mugu ikki veitast fyri longri tíð enn 6 mánaðar í senn, men kunnu endurnýggjast. Kredittirnir skulu rentast við

vanligari bankaútlánsrentu uttan provisión.

Nevndin ásetur gjald fyri veitan av útflutningsveðhaldi. Av hvørjum láni verður tikið stovningargjald uppá 3/4 % av høvuðstólinum.

2. stk. Íløgustudningur og/ella íløgulán til nýstovnað virki, ískoyti ella umskipan av verandi virkjum má tilsamans ikki fara upp um 90 % av íløguútreiðslunum.

Íløgustudningurin má ikki fara upp um 15 % av íløguutreiðslunum, men kann í serstøkum førum vera 20 %.

3. stk. Lán við veðrætti í føstum ognum og bygningum skulu rindast aftur yvir í mesta lagi 20 ár. Avdráttarskái kann gevast í upp til 5 ár frá lánveitingini. Rentan av hesum lánum verður ásett árliga av landsstýrinum eftir tilmæli frá nevndini, og kunngjør landsstýrið áðrenn 1. januar rentuna fyri komandi árið. Lánini verða rentuð á sama hátt.

4. stk. Lán við veðrætti í maskinum og virkisgøgnum skulu rindast aftur yvir í mesta lagi 10 ár. Avdráttarskái kann gevast í upp til 2 ár frá lánveitingini. Rentan av hesum lánum skal vera 1 % hægri enn rentan av lánum móti veðrætti í føstum ognum.

5. stk. Lán og/ella veðhald kunnu veitast til raksturin av virkjum, ið byrja framleiðslu, sum áður hevur verið oroynd í Føroyum. Slík lán, ið skulu bera vanliga bankaútlánsrentu uttan provisión, mugu ikki veitast í meira enn 2 rakstrarár, men kunnu í serstøkum førum veitast til 3 rakstrarár. Hesi lán skulu rindast aftur yvir í mesta lagi 5 ár. Avdráttarskái kann gevast í upp til 3 ár frá lánsveitingini.

6. stk. Studningur kann veitast til rentugjalding av lánum til fíggjan av íløgum í nýggj virkir, ískoytisíløgur og umskipan av verandi virkjum. Rentustudningurin má ikki bera í sær, at rentan av nevndu lánum verður lægri enn sambært 3. og 4. stk.

7. stk. Studningur kann veitast til upplæring av hjálparmonnum hjá einstøkum virkjum ella vinnugreinum. Studningurin má ikki fara upp um 50 % av samlaðu útreiðslunum til upp-

læringina.

8. stk. Studningur kann veitast til gransking viðvíkjandi framleiðsluvíðurskiftunum og vørumenning. Tey einstøku tiltøkini skulu vera greiniliga avmarkað og um úrslitini skal grunnurin fáa gjølliga frágreiðing. Nevndin avger í hvørjum einstøkum føri støddina í studninginum, sum ikki má fara upp um 70 % av teimum beinleiðis útreiðslunum.

Eftir somu reglum kann veitast studningur til ráðgevarahjálp.

9. stk. Studningur kann veitast til einstøk virki við upp til 50 % av útreiðslunum til fyrireikandi, sølufremjandi tiltøk t.d. fyrireikan av lýsingum. Studningur kann veitast við upp til 80 % av útreiðslunum til sølufremjandi tiltøk fyriskipað av fleiri virkjum í felag ella av eini ella fleiri vinnugreinum.

10. stk. Studningur ella partur av hesum, sum veittur verður sbrt. 8. og 9. stk. í § 13, kann verða lagdur um til vanligt veðrættarlán, sbrt. 3. og 4. stk. í § 13, um so er, at granskingin og annað sbrt. 8. og 9. stk. førir til, at høvuðsprojekt ella onnur sølufremjandi tiltøk verða sett í verk.

Nevnd grunsins avger í hvørjum einstøkum føri, hvussu stórur partur av studninginum kann verða lagdur um til vanligt veðrættarlán.

11. stk. Studningur til flutning av føroyskt framleiddum vørum úr Føroyum kann í serligum førum veitast eftir samráð við landsstýrið.

12. stk. Umframt tann í 2. stk. nevnda studning, kann studningur veitast við upp til 15 % av íløgukostnaðinum til stovnan av virkjum í útjaðaraøkjum ella um ein flytur virkið frá meginøkinum til útjaðaraøki. Hesin studningur verður eftir 5 árum lagdur um til vanligt veðrættarlán, um viðkomandi virki eftir nevndu 5 ár og eftir metan nevnd Menningargrunnsins hevur rentabilitet í rakstrinum. Skiftir virki eigara við sølu innanfyri ásettu 5 árini, fellur allur studningurin til gjaldingar beinanvegin. Grunnurin kann tó geva loyvi til, at studningurin verður yvirførdur til nýggju eigararnar.

13.stk. Lán sambært stk. 3 og 4, sum verða veitt til virkir í útjaðaraøkinum, kunnu veitast við eini rentu sum liggur 2 % undir vanligu útlánsrentu grunnsins og sum annuitetslán.

14. stk. Studningur kann veitast til flutning av virki og virkisgøgnum úr møginøkinum til útjaðaraøkini. Studningurin má ikki fara upp um 70 % av flutningskostnaðinum. Herumframt kann studningur til flutning av ráveru og liðugtveru veitast trý tey fyrstu árini til nýstovnað virkið í útjaðaraøki. Studningurin kann í mesta lagi vera 15 % hægri enn veruligi meirflutningskostnaðurin av at liggja í útjaðaraøki.

15. stk. Nevnd grunnsins avger í hvørjum einstøkum føri, hvat meinast við útjaðaraøki og meginøki.

§ 14.

Stovnaður verður tiltaksgrunnur at standa ímóti tapum av útlánum og til trygging av viðurskiftum grunsins við skuldararnar annars.

2. stk. Eftir tilmæli frá umsiting grunsins ger nevndin av, hvussu mikið av rakstraravlopinum skal leggjast í tiltaksgrunnin.

3. stk. Tiltaksgrunnurin má ikki nýtast til útlán, men skal nýtast eftir reglum, sum nevndin ásetir, eftir tilmæli frá fyrisiting grunsins.

§ 15.

Roknskaparár grunsins er fíggjarárið.

2. stk. Grunnurin gevur frá sær roknskap og ársfrágreiðing um virki grunnsins, sum verður at kunngera innan 4 mánaðar eftir, at roknskaparárið er úti.

3. stk. Roknskapurin skal grannskoðast av statsgóðkendum grannskoðara.

§ 16.

Grunnurin er løysur av øllum skatti til land og kommunu.

§ 17.

Heldur nevndin, at endamál grunnsins ikki er til longur, ger nevndin tilmæli til landsstýrið um at taka grunnin av.

2. stk. Í hesum føri tekur løgtingið eftir tilmæli frá landsstýrinum støðu til, hvussu verða skal við ognum grunnsins.

§ 18.

Henda kunngerð fær gildi tann 1988.
Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 50 frá 26. oktobar 1973 við seinni broytingum.

Vilhelm Johannesen
landsstýrismaður

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 17/1988: Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn Íðnaðarins.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september beint í íðnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur nevndin ikki undir við uppskoti landsstýrisins um, at § 5 í verandi lóg verður broytt soleiðis, at tað verður landsstýrið, sum ásetir við teirri í § 7 nevndu reglugerð, hvussu stórt lán, studningur/ella veðhald kann verða veitt einstøkum virki uttan góðkenning frá landsstýrinum, men mælir til at samtykkja reglu um, at § 5 fær tað innihald, at lán upp á meir enn 2 mió. kr. ella veðhald av lánum upp á meir enn 3 mió. kr. til einstakt virki krevur góðkenning frá landsstýrinum.

Viðvíkjandi uppskotnu broytingunum í kunngerðini fyri menningargrunn tekur ein samd nevnd undir við hesum, tó at nevndin skjýtur upp, at § 8, 1. stk. í kunngerðini fær fylgjandi orðing:

"Nevndin eigur at býta veitingar úr grunninum best møguligt millum ymiskar vinnugreinir, og eigur tá serliga at siggja útoyggjunum til góðar."

Samsvarandi omanfyri nevndu viðmerking til uppskot landsstýrisins setir sostatt ein samd íðnaðarnevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

<u>uppskot landsstýrisins</u>

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 16. juni 1973 um menningargrunn fyri íðnað, handverk og tænastufyritøkur við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

1) § 5 verður orðað soleiðis:

§ 1.

Í lagtingslov nr. 37 af 16. juni 1973 om udviklingsfond fyri industri, håndværk og servicevirksomhed med senere ændringer foretages følgende ændring:

1) § 5 affattes således:

"Lán upp á meira enn 2 mió. kr. ella veðhald av lánum upp á meira enn 3 mió. kr. til einstakt virki krevur góðkenning frá landsstýrinum."	"Lån på mere end 2 mio. kr. eller garanti for lån for mere end 3 mio. kr. til en enkelt virksomhed kræver landsstyrets godkendelse."

Anfinn Kallsberg fagnast um, at landsstýrið nú hevur uppskot um broytingar í kunngerðini fyri menningargrunnin, sum innibera lagaligari fígging av virksemi í útjaðarinum. Undir 1. viðgerð varð upplýst frá landsstýrismanninum, at definitiónin upp á "útjaðaraøki" eisini umfatað smápláss inni á meginøkinum. Tá so er, at smápláss á meginøkjum og útoyggjarnar verða eins fyri fígging viðvíkir, so er vandi fyri, at útoyggjarnar verða fyri vanbýti.

Anfinn Kallsberg heldur tí, at skal nakað veruligt henda úti á útoyggjunum á vinnuliga økinum, er tað meiri neyðugt nú enn nakrantíð at fáa setta á gildi lógina um oyggjamenningargrunn.

Anfinn Kallsberg setir sostatt fram soljóðandi

u p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um oyggjarmenningargrunn.</u>	<u>lagtingslov om øudviklingsfond.</u>
<u>§ 1.</u> Settur verður á stovn oyggjarmenningargrunnur.	<u>§ 1.</u> Der oprettes en øudviklingsfond.
<u>§ 2.</u> Endamál grunsins er at veita lán til fremjan av øllum vinnuskapandi íløgum úti á útoyggjum okkara, og sum ikki hava vegasamband við høvuðsvegakervið í Norðoyum, Eysturoy, Streymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy.	<u>§ 2.</u> Fondens formål er at yde lån til at fremme arbejdsskabende investeringer på udøerne, der ikke har vejforbindelse til hovedvejene på Nordoyggjar, Eysturoy, Streymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy.
<u>§ 3.</u> Lánveitingin er treytað av, at viðkomandi eigari hevur í eginpeningi í minsta lagi 10%. Lánið	<u>§ 3.</u> Ydelse af lån er betinget af, at vedkommende ejer i det mindste har en egenkapital på 10%. Lånet

verður tryggjað við pantirætti í viðkomandi virki innanfyri 90% av virðinum. Lánið verður avdráttarfrítt fyrstu 3 árini. Restin verður at rinda aftur yvir 40 ár. Rentan er 3% p.a.

2. stk. Um so er, at virkið skiftir eigara, fellur lánið ella tað, sum stendur eftir, til gjaldingar. Grunnurin kann tó geva loyvi til, at tað, sum eftir stendur av lánum, verður yvirført til nýggju eigararnar.

§ 4. Nevnd grunsins telur 3 limir, sum verða valdir av løgtinginum fyri 3 ár. Ein nevndarlimur gongur út hvørt ár, fyrstu 2 árini við lutakasti.

§ 5. Úr landskassanum verða í fíggjarárinum 1989 veittar grunninum 2 mió. kr. Annars tekur løgtingið á hvørjum ári støðu til játtanir til grunnin.

§ 6. Lán upp á meira enn 1 mió. kr. til einstaks virki krevur góðkenning frá landsstýrinum.

§ 7. Grunnurin hevur rætt til at taka lán við landskassaveðhaldi, tó hægst 3 mió. kr. um árið í 5 ár, fyrstu ferð í fíggjarárinum 1989.

§ 8. Landsstýrið ger við kunngerð reglugerð fyri grunnin.

sikres ved pant i vedkommende virksomhed indenfor 90% af værdien. Lånet er de første 3 år afdragsfrit, lånet tilbagebetales derefter i 40 år. Renten er 3% p.a.

Stk. 2. Såfremt virksomhed skifter ejer, forfalder lånet eller det, der står tilbage af det, til betaling. Fonden kan dog give tilladelse til, at det, der står tilbage af lånet, bliver overført til de nye ejerne.

§ 4. Fondens bestyrelse består af 3 medlemmer, som vælges af lagtinget for 3 år. Et bestyrelsesmedlem afgår hvert år, de første 2 år ved lodtrækning.

§ 5. Af landskassen ydes der fonden i finansåret 1987 2 mio. kr. Iøvrigt tager lagtinget hvert år stilling til bevillinger til fonden.

§ 6. Lån på mere end 1 mio. kr. til en enkelt virksomhed skal godkendes af landsstyret.

§ 7. Fonden har ret til at optage lån med landskassegaranti, dog højst 3 mio. kr. årlig i 5 år, første gang i finansåret 1987.

§ 8. Landsstyret udfærdiger vedtægter for fondet, der bekendtgøres.

§ 9. Grunnurin er leysur av øllum skatti.	§ 9. Fonden er fritaget for enhver skat.
§ 10. Løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 1989.	§ 10. Lagtingsloven træder i kraft 1. juni 1989.

ÍDNAÐARNEVNDIN, 6. september 1988.

Heini O. Heinesen Poul J. Olsen Sverre Midjord

Eilif Samuelsen Anfinn Kallsberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11600 . Telex 81235 lingm fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

1. september 1988

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 308-9-3

JK/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 18/1988: Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Førova.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Førova.	lagtingslov om bygning af lokaler til Fiskeribiologisk Laboratorium og Færøernes Akademi.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at taka upp lán til bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Føroya uppá 11 mió. kr.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til at optage lån til bygning af lokaler til Fiskeribiologisk Laboratorium og Færøernes Akademi på 11 mio. kr.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Við løgtingsmáli nr. 118/1986: Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna, legði landsstýrið tann 31. mars 1987

fyri løgtingið uppskot til bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna.

Løgtingið samtykti tann 14. apríl 1987: "at landsstýrinum saman við fíggjarnevnd løgtingsins verður heimilað at taka upp lán til bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna uppá tilsamans 17,5 mió. kr."

Gongdin í málinum hevur verið tann, at tá prosjekteringin byrjaði, skuldi Fiskirannsóknarstovan og Vaktar- og Bjargingartænastan byggja saman. Síðani er Vaktar- og Bjargingartænastan farin úr prosjektinum, men fyrra løgtingsmálið var tó prosjektarað soleiðis, at annar stovnur kundi koma inn í staðin.

Landsstýrið samtykti á fundi 16. november 1987, at Fróðskaparsetrið fekk at ráða yvir teir eyka 800 m^2, sum vórðu bygdir aftrat Fiskirannsóknarstovuni, eftaná at møguleikar viðvíkjandi bygging saman við Sjómansskúlanum vóru kannaðir og vrakaðir.

Kostnaðarmetingin, ið varð løgd fram í fyrra løgtingsmáli, er nú vorðin regulerað av móttiknum tilboðum og metingum, við meir- og umprosjektering, harí íroknað víðkan av bygninginum við 466 m^2, størri krøvum til tekniskar installatiónir og prís- og lønarvøkstri í byggitíðini frá licitatitión til arbeiðsbyrjan. Eisini eru tikin við 7% vøkstur í lønum og prísum í byggitíðini.

Kostnaðarmetingin frá arkitektinum, skjal 1 og 2, dagfest 25. august 1988 er uppá ..... 40.000.000 kr.
Herfrá gongur upphædd, ið er løgd í
grunn í tíðarskeiðinum 1985-89 11.500.000 kr.
og lánsupphædd sambært
fyrra løgtingsmáli 17.500.000 kr. 29.000.000 kr.
Søkt verður sostatt um at
játtaðar verða 11.000.000 kr.

Henda lánsupphædd fevnir ikki bert sum áður nevnt um regulering av kostnaðinum av sjálvari Fiskirannsóknarstovuni, men eisini um innrætting av náttúruvísindaligu deildini hjá Fróðskaparsetri Føroya.

Byggingin er mett at verða liðug í fyrra hálvári av 1990.

Ein fyrimunur við hesi sambygging er, at høglistrupulleikar hjá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni verða loystir uttan at neyðugt verður at fremja bygging til hendan stovn.

Atli P. Dam
løgmaður

/
/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 18/1988: Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Føroya.

Málið er lagt fram av Landsstýrinum 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður greitt frá, at talan er um eina økta játtan uppá kr. 11 mió. og verður víst til tað kostnaðarmeting ið var løgd fram í fyrra løgtingsmálinum, har talan var um lántøku uppá 17.5 mió. kr. pluss umleið 8 mió. kr. í grunni til bygging av hølum til fiskirannsóknarstovuna, nú er veroin regulerað av tilboðum og metingum, v.m. - og umprojekteringum hará fróknað viðkan av bygninginum við 466 m², størri krøvum til tekniskar installatiónir og prís- og lønavøkstri í byggitíðini frá licitiatión til arbeiðsbyrjan. Eisini er tikin við 7% vøkstur í lønum og prísum í byggitíðini.

Tilskilað verður, at talan ikki bert er um regulering av kostnaðinum av sjálvari fiskirannsóknarstovuni, men eisini um innrætning av náttúruvísindarligu deildini hjá Fróðskaparsetrið Føroya, - hetta eftir at Vaktar- og bjargingartænastan er farin úr projektinum.

Samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN 6. september 1988.

Jørgen Thomasen Asbjørn Joensen Sigmar Hansen

Adolf V. Hansen Ivan Johannesen Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11850 . Telex 81135 lagma fo . Telefax 14943 . Postboks 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15, laygardag stongt

1. september 1988

F. L. j. nr.
(at tilskilla í svari) 1910-2-13-4

NáV/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 19/1988: Keyp av ognum til landsfyrisitingina.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um keyp av ognum til landsfyrisitingina.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa matr. nr. 1333f og matr. nr. 1333a, Tórshavn, fyri ávikavist 18 mió. kr. og 9 mió. kr. og at taka upp lán til keypið uppá tilsamans 27 mió. kr.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om køb af ejendomme til landsadministrationen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe matr. nr. 1333f og matr. nr. 1333a, Tórshavn, for henholdsvis 18 mio. kr. og 9 mio. kr. og til at optage lån til købet på ialt 27 mio. kr.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sum tað helst er øllum kunnugt, er landsumsitingin, hvat hølum viðvíkur, sera illa fyri. Meginparturin av teimum almennu stovnunum húsast í leigaðum hølum, og eru tær árligu útreiðslurnar til húsaleigu sera stórar.

Landsstýrið hevði í hyggju at bøta um tey nevndu viðurskifti við at fara undir bygging til almennu umsitingina, men tað ovurstóra virksemi innan byggivinnuna førdi við sær, at tað ikki var ráðiligt at økja virksemið við almennari bygging, men í staðin heldur royna at keypa verandi bygningar.

Henda lóg snýr seg um at keypa húsini á matr. nr. 1333f í Havn hjá P/F Kartni Winther til almenna umsiting og at keypa økið matr. nr. 1333a eisini í Havn hjá Torbjørn Sørensen til komandi bygging til landsumsitingina. Hóast tað ikki eru endaligar ætlanir um tað enn, er tað ein møguleiki, at Sjónvarp Føroya, sum búleikast undir heilt ótolandi høllisviðurskiftum, kann fáa innivist í matr. nr. 1333f, men í tí føri verða so ávísar innandura broytingar at fremja tey komandi árini.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/
/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 19/1988: Keyp av ognum til landsfyrisitingina.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í 5 minniluttar.

Ein minniluti (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) førir fram:

Vísandi til upplýsingar, fíggjarnevndin hevur fingið, er bygningurin, talan er um, hvørki egnaður til sjónvarpshús ella umsitingarbygning, og kann nevndi minniluti tí ikki taka undir við fyriliggjandi máli.

Ein annar minniluti (Signar Hansen) leggur dent á, at landsumsitingini verða skaptar betur umstøður at arbeiða undir. Somuleiðis leggur minnilutin stóran dent á, at sjónvarpinum verða skaptar nógv betri umstøður í starvi sínum, enn tær hann nú hevur.

Landsstýrið mælir í hesum uppskoti til at keypa húsini á matr. nr. 1333^{f} í Havn hjá P/f Kartni Winther til almenna umsiting. Møguleikin verður nevndur at nýta húsið til sjónvarpshús. Minnilutin heldur, at rættari er at fara undir at byggja nýtt sjónvarpshús, ið verður innrættað til endamálið, heldur enn at keypa eldri hús og síðani umbyggja tað.

Undir fíggjarnevndarviðgerðini er upplýst frá serkønum hjá landsstýrinum, at húsið, ið landsstýrið mælir til at keypa - møguliga til sjónvarpshús, ikki er serliga vælegnað til endamálið - m.a. nøktar tað ikki tann tørv, ið stovnurin hevur brúk fyri. Tá ið húsið er umbygt, verður kostnaðurin mettur til 40 mió. kr. Tann serkøni sigur, at eitt nýtt sjónvarpshús fer at kosta umleið tað sama - nevniliga 40 mió. kr.

Á fundinum varð somuleiðis upplýst, at húsið er ikki

vælegnað sum fyrisitingarhús.

Minnilutin heldur til, at vit fástaðin fyri atlan landsstýrisins, sum uppskotið ber í sær, heldur fara at byggja av nýggjum, soleiðis at vit fáa eitt gott og tíðarhóskandi sjónvarpshús. Minnilutin mælir somuleiðis til, at farið verður undir hesa bygging so skjótt sum møguligt og at landsstýrinum verður veitt heimild til at taka upp lán til byggingina.

Út frá tí, tá er borið fram, setir minnilutin fram fylgjandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt beinanvegin at seta í gond arbeiði

1) at útvega hóskiligt grundstykki til sjónvarpshús,
2) at seta í gongd projektering av nýggjum sjónvarpshúsi,
3) at seta bygging av nýggjum sjónvarpshúsi í gond í samráð við fíggjarnevndina.

og

U p p s k o t

til

løgtingslóg um lántøku til bygging av sjónvarpshúsi.	lagtingslov om optagelse af lån til bygning af tv-hus.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at taka upp til 30 mió. kr. í láni til bygging av nýggjum sjónvarpshúsi.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til at optage op til 30 mio. kr. i lån til bygning af nyt tv-hus.
§ 2. Henda lóg kemur í	§ 2. Denne lov træder i

gildi dagin eftir kunngerð.	kraft dagen efter kundgørelse.

Ein minniluti (Adolf V. Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein minniluti (Poul Michelsen) tekur støðu í tingsalinum.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988.

Jørgen Thomsen Signar Hansen Flemming Mikkelsen

Adolf V. Hansen Asbjørn Joensen Poul Michelsen

Ivan Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11000. Telex 81235 lagma fa. Telefax 14941. Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardagur stongt

1. september 1988

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 1699-I-11

JH/BH

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 20/1988: Millumlandasáttmáli viðvíkjandi dálking av havinum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at "Bekendtgørelse af konvention af 4. juni 1974 om forhindring af landbaseret havforurening" við uppískoyti frá 26. mars 1986, verður lýst at gelda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at Paris-sáttmálin frá 4. juni 1974 "Om forhindring af landbaseret havforurening" og uppískoyti til sáttmálan frá 26. mars 1986 verða lýst at gelda í Føroyum.

Paris-sáttmálin frá 4. juni 1974 er galdandi fyri dálking av havinum við evnum, sum eftir áunum renna til sjós ella verða tveitt til sjós av landi.

Uppískoytið til sáttmálan frá 26. mars 1986 er galdandi fyri luftborin evni, ið dálka havið.

Sáttmálin fevnir eisini um havøkið rundan um Føroyar.

Um dálking av havinum við evnum frá skipum, er galdandi ein serligur millumlandasáttmáli, nevniliga Oslo-sáttmálin frá 19. februar 1972 "Om forhindring af havforurening ved

dumpning fra skibe og luftfartøjer" og sum er galdandi fyri Føroyar.

Tey evni, sum ikki verður loyvt at lata renna til sjós ella tveita til sjós eru tílík, sum ikki niðurbrótast í náttúruni, evni, sum djór eta og sum hópa seg upp í føðiketuni, evnir sum drepa livandi verur og harvið broyta javnstøðuna í økologiska kervinum og annars evni, sum eru til stóran bága hjá fiskivinnuni.

Í skjali A, kap., I og II, í viðhefta sáttmála er nærri tilskilað, hvørji evni londini binda seg til heilt at steðga við at veita til sjós og hvørji evnir ein eigur at avmarka mest møguligt.

Landsstýrið heldur at Føroyar sum ein fiskivinnutjóð eigur at binda seg til at fylgja reglunum í hesum sáttmála.

Nú nýggj umhvørvislóg er viðtikin á tingi í seinastu setu og skjótt kemur í gildi, verður mett, at lógargrundarlagið fyri at lúka treytirnar í sáttmálanum eru loknar.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/
/ Jalgrim Hilduberg

Álit

frá

løgtingsmáli nr. 20/1988: Millumlandasáttmáli viðvíkjandi dálking av havinum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint til viðgerðar í umhvørvisnevndina.

Landsstýrið mælir við løgtingsmáli nr. 20/1988 løgtinginum til at samtykkja, at París-sáttmáli frá 4. juni 1984 um forðing av dálking av havinum frá landi við ískoyti frá 26. mars 1988 verður lýstur at galda í Føroyum.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar um, at "bekendtgørelse af konvention af 4. juni 1974 om forhindring af landbaseret luftforeurening" við ískoyti frá 26. mars 1984, verður lýst at galda í Føroyum.

UMHVØRVISNEVNDIN, 5. september 1988.

Jóannes Dalsgaard Øssur av Steinum Ingrid Sondum

Johannes Martin Olsen Anfinn Kallsberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn

1. september 1988

F. L. j. nr. 1500-1-11-2

Tlf. 11000 . Telex 81235 lingua fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

KH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 21/1988: Einvís føroysk avmarking í toskaveiðuni í Barentshavinum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu einvísu avmarking í toskaveiðuni í Barentshavinum í 1988, sum sett út í brævi til norskar og sovjettiskar myndugleikar.

Viðmerkingar:

Norskir myndugleikar vendu sær til Føroya Landsstýri tíðliga í juli 1988 og gjørdu vart við, at Noreg og Sovjetsamveldið á fundi seinast í juni vóru komin ásamt um at minka veiðuna eftir toski í Barentshavinum við 22%. Somuleiðis vóru londini samd um, at heita á tey lond, sum tey høvdu fiskiavtalu við, um at minka við sama prosenti.

Fundur var millum føroyskar og norskar myndugleikar 11. juli. Føroysku megin varð dentur lagdur á, at fiskivinnuskipanin stóð óbroytt, og at støðið í teimum ikki varð lækkað.

Hinvegin er tað greitt, at fiskifrøðingarnir nú hava eina nógv daprari meting av útlitinum fyri stovninum, enn tá fiskivinnusáttmálarnir vórðu gjørdir. At útlitini eru verri, sæst eisini av tí vanliga fiskiskapinum eystanfyri í ár, sum hevur merkt, at hóast ísfiskaveiðuna í vetur eystanfyri, er kvotan í norskum sjógvi ikki uppfiskað.

Landsstýrið hevur skrivað bæði Noreg og Sovjettsamveldinum og sagt seg til reiðar at leggja fyri løgtingið eitt uppskot, sum minkar veiðuna við einum ávísum tonsatali, sum tekur daprari stovnsútlitið til eftirtektar.

Norskir myndugleikar standa fast við, at teir ynskja 22% niðurskurð í tí, sum møguleiki er at veiða á norskum øki. Landsstýrið hevur afturímóti ført fram, at tað avgerandi má vera at síggja stovninum til góðar, og við at taka størri niðurskurðin í sovjettiskum sjógvi, verður støddarbýtið gagnligari fyri stovnin.

Atli P. Dam
løgmaður

/
/Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 21/1988: Einvís føroysk avmarking í toskaveiðuni í Barentshavinum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í marknaðarnevndina.

Ein samd marknaðarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir tinginum til at samtykja tað.

MARKNAÐARNEVNDIN, 5. september 1988.

Hilmar Kass Hergeir Nielsen Karin Kjølbro

Hendrik Old Olaf Olsen Pauli Ellefsen

Jógvan Sundstein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

1. september 1988

F. L. j. nr. 401-2-6

TF. 11020 . Telex 81235 fingov fo . Telefax 14942 . Postbox 64
Argreiðslutíð: Kl. 10—15. leygardag stongt

JH/cr

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 22/1988: Býti av rakstraravlopi landskassans fyri fíggjarárið 1987.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um býti av rakstraravlopi landskassans fyri fíggjarárið 1987.

§ 1. Rakstraravlop landskassans fyri fíggjarárið 1987 verður at býta soleiðis:
40 mió. kr. í Ráfiskagrunnin
50 mió. kr. til berghol- og brúgvagerð í grunn
og
restin í grunnin til effektivar veðhaldsbindingar.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om fordeling af landskassens driftsoverskud for finansåret 1987.

§ 1. Landskassens driftsoverskud for finansåret 1987 fordeles således:
40 mio. kr. til råfiskefonden
50 mio. kr. til fonden til tunnel- og brobygning
og
resten til fonden til effektive garantiforpligtelser.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 1987 var løgtingslóg nr. 5 frá 25. januar 1983 um býti av rakstraravlopi landskassans, har 1/3 fer í bergholsgrunn, 1/3 í grunnin til endurnýgging av skipaflotanum og 1/3 í landskassan, avtikin, og ein serstøk lóg varð gjørd um býti av rakstraravlopi landskassans 1986. Landsstýrið leggur nú fyri tingið uppskot um lóg um rakstraravlop landskassans fyri 1987.

Roknskapurin fyri 1987 er ikki heilt endaliga gjørdur enn, men tey tøl, ið eru til taks á gjaldstovuni nú vísa, at rakstraravlop landskassans fyri 1987 verður 280 mió. kr.

Landsstýrið skjýtur upp, at 40 mió. kr. fara í bergholsgrunnin, 40 mió. kr. í ráfiskagrunnin og restin í grunnin til effektivar veðhaldsbindingar. Tað er neyðugt fyri gjaldføri landskassans, at játtanin í hesar grunnar svarar til nýtsluna úr grunnunum.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/

/ Jalgrim Hilduberg

Álit

í

løgtingsmáli nr. 22/1988: Býti av rakstraravlopi landskassans fyri fíggjarárið 1987.

Málið er lagt fram av landsstýrinum 31. august 1988 og eftir 1. viðgerð 2.september 1988 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirihluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Signar Hansen og Adolf V. Hansen) mælir til at samtykja uppskot landstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) førir fram, at sambart álit í løgtingsmálið nr. 11/1988 verður tiltaksgrunnurin hjá ráfiskagrunningum tømdur tá hetta árið er at enda. Minnilutin setir fram nýggja § 1 í staðin fyri uppskot landstýrisins:

§ 1. Rakstraravlop landskassans fyri fíggjarárið 1987 verður at býta soleiðis:
40 mió. kr. í Ráfiskagrunnin
50 mió. kr. til bergnols- og brúgvagerð í grunn
30 mió. kr. til tiltaksgrunnin hjá ráfiskagrunninum
og
restin í grunn til effektivar veðhaldsbindingar.

§ 1. Landskassens driftsoverskud for finansåret 1987 fordeles således:
40 mio. kr. til råfiskefonden
50 mio. kr. til fonden til tunnel- og brobygning
30 mio. kr. til råfiskefondens reservefond
og
resten til fonden til effektive garantiforpligtelsen.

Minnilutin (Poul Michelsen) kann ikki taka undir við uppskotið landstýrisins og setir fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

Uppskot landstýrisins:

§ 1 verður orðað soleiðis:	§ 1 formuleres således:
§ 1. Rakstraravlop landskassans fyri fíggjarárið 1987 verður at býta soleiðis: 75 mió. kr. í Ráfiskagrunnin 40 mió. kr. til bergkols og brúgvagerð í grunn 100 mió. kr. í grunn til effektivar veðhaldsbindingar og rest á kapitalkonto.	§ 1. Landskassens driftsoverskud for finansåret 1987 fordeles således: 75 mió. kr. til råfiskefonden 40 mio. kr. til fonden til tunnel- og brobygning 100 mio. kr. til fonden for effektive garantiforpligtelser og resten til kapitalkonto.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988

Jørgen Thomsen Asbjørn Joensen Signar Hansen

Adolf V. Hansen Ivan Johannesen Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen

Jógvan I. Olsen
Johannes M. Olsen
løgtingsmenn

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 23/1988: Metingar í samband við bygging av nýggjum flogvølli í Føroyum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at hava kanningarnar frá loftferðslumálaráðnum frá 1963: "Flyveplads på Færøerne" og frá 1970: "Permanent Lufthavn på Færøerne" við í metingunum, tá talan er um bygging av nýggjum flogvølli í Føroyum.

Viðmerkingar:

Spurningurin um framtíðarflogvøll hevur verið nógv frammi seinastu tíðina, men er orðaskifti komið í tað tronga spor, at annaðhvørt er tað Vágarnar ella Glyvursnes.

Víst kann verða á, at loftferðslumálaráðið hevur gjørt eitt stórt kanningararbeiði fyri at finna besta plássið til at byggja framtíðarfloghavn í Føroyum á, og eru teir komnir til tað úrslit, at tað er hvørki í Vágum ella á Glyvursnesi, soleiðis sum niðurstøðurnar av kanningunum frá 1963 og 1970 vísa:

"KONKLUSION (1963)

"Skønt de foran anførte overslagsberegninger for anlæg af en flyveplads på Færøerne er baseret på et meget

spinkelt opmålingsmateriale, må det være klart, at forslagene

b. Glyvursnes

og c. Kirkebønæs

med anlægsudgifter at størrelsesorden 50-60 millioner kr. ikke kan anbefales, så meget mere som ingen af pladserne har nogen god orientering i forhold til hovedvindretningen. Disse forhold kan ikke opvejes af den centrale beliggenhed.

For det tredie forslag ved Tórshavn

a. Højvig

gælder de samme betragtninger, idet der dog ikke er beregnet nogen anlægsudgift for en 1600 m lang bane, da terrænet ikke tillader så lang en bane. En 1000 m lang bane kan anlægges for ca. 10 mill. kr., men en sådan bane vil ikke løse trafikproblemet på Færøerne.

Forslaget om en flyveplads på

e. Sandø

er beflyvningsmæssigt ideelt og anlægsudgifterne bliver ca. 16 mill. kr., men da det er forbundet med store vanskeligheder at komme til og fra Sandø, vil dette forslag næppe kunne anvendes.

Tilbage bliver således kun forslagene

d. Næs

og f. Vagar

og her vil Næs for en 1600 m lang bane på alle områder have fortrin for Vagar, hvorfor Næs må anbefales som den bedst egnede plads. Anlægsudgiften bliver her ca. 25 mill. kr. mod Vagars ca. 30 mill.

Såfremt man vil gå ind for kortere baner end 1600 m, vil en udbygning af Vagar flyveplads blive billigst, men man skal dog ned på banelængder på 1400 m inden forskellen i anlægsudgifter bliver væsentlig - ca. 13 mill. kr. for Vagar og 23 mill. kr. for Næs, og man opnår for dette beløb ikke de fordele på Vagar, som man kan få på Næs, nemlig

1. Forhold, der tillader instrumentindflyvning,
2. Relativ central beliggenhed,

og 3. Udvidelsesmuligheder."

"KONKLUSION (1970):

Undersøgelsen af sigtbarhedsforholdene viser, at der ikke er grundlag for at antage, at vejrforholdene ved Næs er dårligere end ved Glyvursnes, tværtimod kan man regne med, at forholdene ved Næs vil være en smule bedre end ved Glyvursnes.

Undersøgelsen af vindforholdene viser, at en bane ved Næs vil have en regularitet, der er 5% bedre end en bane ved Glyvursnes. Konklusionen må da på det foreliggende grundlag blive, at Næs er den mest velegnede lokalitet."

Haldast má, at hesar kanningar ikki eru ávirkaðar av lokaláhugamálum, tá tær eru gjørdar av útlendingum.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988.

Jógvan I. Olsen Johs. M. Olsen

Felagsálit við løgtingsmál nr. 5/1988: Krav til framtíðarflogvøll í Føroyum. (bls. 54)

Johannes M. Olsen
Jógvan I. Olsen
Løgtingsmenn

Føroya Lagting.

Løgtingsmál nr. 24/1988: Løgtingslóg um útbygging av telefonskipanini í Eysturoynni og áseting av tænastustøði hjá TFL mótvegis vinnufyritøkum.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um útbygging av telefonskipanini í Eysturoynni og áseting av tænastustøði hjá Telefonverki Føroya Løgtings mótvegis vinnufyritøkum.	Lagtingslov om udbygning af telefonorganisationen på Eysturoy og fastlæggelse af Telefonverks Førova Løgtings serviceniveau vedrørende erhvervsforetagender.
§ 1. Telefonverki Føroya Løgtings verður heimilað saman við umboðum fyri vinnufyritøkum í Eysturoynni at gera eina útbyggingarætlan, sum grundað á framkomið tøkni, kann tryggja eina hóskandi teleskipan fyri økið fram til aldarmótið.	§ 1. Telefonverk Føroya Lagtings bemyndiges til sammen med repræsentanter for erhvervsforetagender på Eysturoy at udfærdige en udbygningsplan, som grundet på avanceret teknik, kan sikre en passende teleorganisation for området frem til århundredeskiftet.
§ 2. Útbyggingarætlanin,	§ 2. Udbygningsplanen, som

sum í høvuðsheitinum skal vera liðug 1. januar 1989, verður sum skjótast eftir tað at leggjast fyri tingið til góðkenningar.

§ 3. Telefonverki Føroya Løgtings verður heimilað saman við almennum og privatum stovnum og virkjum at gera eina endamálsorðing av tænastuskyldum telefonverksins mótvegis tess viðskiftafeløgum grundað á nýggjasta tøkni, sum kann tryggja stovnum og vinnufyritøkum kring alt landið lut í verandi og komandi telesamskiftismøguleikum.

§ 4. Henda endamálsorðing verður saman við tí í § 2 nevndu útbyggingarætlan at leggjast fyri tingið til góðkenningar.

§ 5. Til at gera útbyggingarætlaninna sambært § 1 velur telefonverkið 3 limir og tingið 3 limir frá vinnufyritøkum í Eysturoynni. Somuleiðis velur telefonverkið 3 limir og tingið 3 limir til at gera endamálsorðingina sambært § 3. Allir limirnir skulu

i principperne skal være færdiggjort 1. januar 1989, skal herefter forelægges lagtinget til godkendelse.

§ 3. Baseret på den nyeste teknologi, der kan sikre institutioner og erhvervsforetagender over hele landet til de værende og kommende telekommunikationsmuligheder bemyndiges Telefonverk Føroya Løgtings sammen med offentlige og private institutioner at udfærdige en målsætningsformulering af Telefonverkets tjenesteforpligtelser vedrørende dets abonnenter.

§ 4. Denne målsætningsformulering skal sammen med den i § 2 nævnte udbygningsplan forelægges for lagtinget til godkendelse.

§ 5. Til at udfærdige udbygningsplanen i henhold til § 1 vælger telefonværket 3 medlemmer og lagtinget 3 medlemmer fra erhversforetagender på Eysturoy. Ligeledes vælger telefonværket 3 medlemmer og lagtinget 3 medlemmer til at udfærdige målsæt-

vera valdir áðrenn 1. oktober 1988.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

ningsformuleringen i henhold til § 3. Alle medlemmerne skal være valgt inden 1. oktober 1988.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað er eingin loyna, at telefonviðurskiftini serliga í Eysturoynni í mong ár hava verið og framvegis eru út av lagi vánalig. Júst hetta økið er tað í Føroyum, har mest vinnufyritøkur eru, og er hesin trupuleikin við vánaligu teleskipanini orsøk til, at hópin av tíð og peningi verður mist í samband við vánaliga ella als ikki virkandi teleskipanirnna.

Seinastu tíðina hevur ein bólkur av monnum frá vinnufyritøkum, stovnum og kommunum í Eysturoynni gjørt vart við vandamálini í verandi og ætlaðu útbyggingini við endurnýtslu av gomlum tøkni, sum væl kann verða orsøk til, at hetta øki um stutta tíð aftur gerst eftirbátur í mun til restina av landinum, eitt nú høvuðstaðarøkið.

Hesin telefonbólkur hevur frá eini av fremstu teleráðgevarafyritøkum í Danmark fingið eina frágreiðing um hesi viðurskifti.

Í hesi frágreiðing finst tylgjandi almenna meting um viðurskiftini (nakað stytt her):

> "Orsøkin til teir almennu trupuleikarnar við ikki at "sleppa ígjøgnum" er týðuliga ein kapasitetsspurningur. Tað hevur ikki verið gjørligt at avgera, um tann svíkjandi kapasitetur-in kemst av ov lítlum grundleggjandi kapasiteti, ella hann kemur av, at partar av skipanini detta burtur inn ímillum vegna brek.
> Hvat viðvíkur øðrum brekum í skipanini, sum felagarnir eru úti fyri, so eru hesi týðulig tekin um grundleggjandi brek í skipanini. Tað er ørkymlandi, at tílík brek hava vart so leingi, uttan at tað hevur eydnast TFL at rætta tey. Orsøkir

nar til hetta kann verða ein av hesum:
- TFL er møguliga ikki klárt yvir ólagið, tí eingin systematisk kvalitetseftirkanning fer fram.
-Fyrisitingin á TFL er møguliga ikki før fyri at gera nakað við ólagið.
-Kervið hjá TFL er møguliga ov niðurslitið/gamalt/vánaliga umsitið.

Fløguætlanirnar hjá TFL áttu í teorini at gjørt skipanina betri í Eysturoynni, men nógvar umstøður fáa teg at stúra fyri, hvussu henda ætlan fer at virka:
-Ætlanirnar eru grundaðar á mátingar frá 1986, tá kapasitetstrupuleikar eisini vóru. Tað er tí at óttast fyri, at veruligi tørvurin er undirmettur.
-Tað tykjast at vera serlig viðurskifti í Føroyum, sum merkja, at dagligu broytingarnar í nýtsluni av telefonskipanini eru størri enn aðrastaðni, og tað er eftir tí, sum upplýst er, ikki likin hædd fyri hesum í ætlanunum. Her verður eisini hugsað um, at allar royndir týða uppá, at sambandið er vánaligari, tá ið tað regnar, og TFL sigur, at fólk tosa meira í telefon, tá ið tað regnar. Um so er, má tað vera náttúrligt at krevja, at skipanin klárar tørvin, eisini tá ið tað regnar
-Tann sera stóra endurnýtslan av verandi gamla kervi kemur óivað av, at vegna tekniska eitlið á støðunum, er tað trupult og dýrt at útvega nýggj kervi til viðkanir. Tað fær teg at stúra fyri fylgjunum, tá ið ein drívandi partur í fløguætlanini er framhaldandi at byggja á avoidað tól (serliga ARK), heldur enn at skifta um til nýggjan teknikk, sum vildi verið meira álítandi í rakstri og kravt minni umsiting.
-Tann ætlaða sundurbýtingin av gomlu støðini í Havn í 2 partar og útbygging av eini triðju, ber í sær vanda fyrí nýggj brek og ólag í skipanini, serliga á teimum "nýggju støðunum". Sambært TFL hava teir tó góðar royndir í tílíkum uppgávum.
-Støðan í Eysturoynni sigst at vera komin av, at viðtøka av viðkaninni av eini fløguætlan fyri TFL varð seinkað í 2 ár. Henda ætlan fevnir um eina rað av nýggjum tiltøkum (t.d. mobiltelefonskipanin). Tað kann kortini ikki góðtakast, at

ein stovnur ikki sum minsta mál ger fløgur á ein tílíkan hátt, at ein vanlig útbygging kann fram eftir tørvunum á verandi, grundleggjandi tænastum."

Tekniski ráðgevin mælir bólkinum til:

1. Neyvt at fylgja við umleggingini av telefonskipanini í Eysturoynni og upplýsa TFL um vandamál skjótt og neyvt,
2. felagarnir eiga á skipaðan hátt at rapportera til TFL um øll brek í skipanini og halda fram til brekini verða rættað,
3. felagarnir eiga skriviliga at klaga til TFL, tá góðska og tænstur eru niðanfyri eina rimiliga hædd.
4. folagnir eiga at biðja TFL um at styrkja sambandi við felaganar í Eysturoynni, t.d. við at
   - útnevna ein serligan kontaktpersón hjá TFL viðv. Eysturoynni, - kunna felagarnar í Eysturoynni tíðum um ætlanir hjá TFL,
   - halda kontaktfundir við felagarnar, har báðir partar fáa høvi at leggja fram vandamál o.s.fr.
5. Felagarnir eiga at biðja TFL at fara í gongd við skipaðar mátingar av góðskuni á telefonskipanini.
6. Vinnulívið og almenna umsitingin í Føroyum eigur at umhugsa at seta krøv til TFL at styrkja tænastuveitingina yvir fyri vinnulívinum, herundir rágeving um og hjálp at nýta nýggja tøkniø í telefonviðurskiftum.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988.

Johannes M. Olsen Jógvan I. Olsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 25/1988: Løgtingsmál um fuglaveiðu. (62/87).

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 20. apríl 1988 beint í umhvørvisnevndina.

Umhvørvisnevndin legði fram álit 4. mai 1988, og sama dag samtykti løgtingið, at nevndin skuldi fram sum millumtinganevnd í málinum.

Uppskotið er tilevnað av serkønari nevnd, sett av landsstýrinum. Sum heild hevur landsstýrið tikið undir við uppskotinum frá ti serkønu nevndini í so at siga øllum viðurskiftum uttan í spurninginum um skjótiloyvi. Serkøna nevndin hevði skotið upp, at bert tey, ið høvdu eitt serligt skjótiloyvi, kundu hava loyvi at nýta byrsu. Hetta punkt hevur landsstýrið tikið burtur úr lógaruppskotinum frá serkønu nevndini.

Sum heild kann sigast, at reglurnar fyri fuglaveiðu við uppskoti landsstýrisins eru gjørdar einfaldari, skilligari og komnar eru nú generellar reglur fyri hvar og hvussu nær landi loyvt er at skjóta. Ein av nøvuðsbroytingunum er, at tað eftir lógaruppskotinum verður bannað at skjóta á sumri. Minsta frástøðan frá bergi, tá skotið verður, er stytt úr 5,5 km niður í 4 km, meðan tíðin, tá bjørgini eru friðað, er longd 1½ mánað (frá 15. mars - 31. august til 1. februar - 31. august).

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini hildið fundir við fakligu nevndina (Óla Jákup Hentze, Bergur Olsen og Marni av Kák), Doretu Blok, Andrias Reinert o.fl.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Øssur av Steinum,

og Ingrið Sondum) tekur sum heild undir við uppskotinum, men hevur út frá teimum sjónarmiðum, sum komu fram undir 1. viðgerð, avgjørt at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins viðvíkjandi broytingum, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 5. 1. stk. verður í staðin fyri orðið "týning" verður sett: "minking".
2) Í § 5. 3. stk. verður skoytt upp í aftaná "týning": "av skaðadýrum".
3) Í § 6. 1. stk. verður sett í staðin fyri "kongs-" verður sett: "lands-".
4) § 10 verður 1. stk. orðað soleiðis:
"Til fuglaveiðu má byrsa bert nýtast á báti. Tó er loyvt at veiða við byrsu á landi í tíðarskeiðinum 1. oktober - 1. februar.
2. stk. Føroya Náttúrugripasavn kann í heilt serligum førum geva undantaksloyvi frá reglunni í § 10. 1. stk."
5) § 11 verður orðað soleiðis:
"Ongastaðni er loyvt at skjóta nærri landi enn 200 m í tíðarskeiðinum

1) I § 5, stk. 1 sættes ordet: "udtyndning" i stedet for "udryddelse".
2) I § 5, stk. 3 tilføjes efter ordet "udryddelse": "af skadedyr".
3) I § 6, stk. 1, sættes "lands-" i stedet for: "kongs-".
4) § 10, stk. formuleres således:
"Ved fuglefangst er det kun tilladt at anvende skydevåben fra båd. Det er dog tilladt at anvende skydevåben ved fuglefangst på land i tiden 1. oktober - 1. februar.
Stk. 2. Færøernes Naturmuseum kan under helt særlige omstændigheder dispensere fra reglen i § 10. stk. 1."
5) § 1 formuleres således:
"Det er ingen steder tilladt at skyde nærmere land end 200 meter i tiden 1. februar - 1.

1. februar - 1. oktober." oktober.

Undir nevndarviðgerðini og á teimum fundum, nevndin hevur hildið við tey serkønu, hevur nógv verið talað um støðuna hjá fuglastovnum okkara, serstakliga hjá bjargafuglinum.

Í hesum sambandi er vorðið heilt greitt, at stórur tørvur er á nøvvum fuglakanningum - serstakliga teljingum. Tað stendur nevndini greitt, at Føroyar eru eftirbátur á hesum øki, um vit samanbera okkum t.d. við Bretland og Noreg.

Meirilutin heldur tí, at tíðin nú er komin til at byrja skipaðar og regluligar teljingar og kanningar av serstakliga sjófuglastovninum. Hesar kanningar eiga at fara fram á hvørjum ári og um alt landið.

Meirilutin er kunnugur við ætlanir hjá Bergi Olsen, fuglafrøðinigi, um eina regluliga, skipaða teljing av føroysku sjófuglastovnunum. Ætlanin er, at kanning skal ganga yvir 3 ár og er hon mett at kosta kr. 500.000.

Tá havt verður í huga, at støðan hjá sjófuglinum gevur eina sera týðandi og greiða mynd av vistfrøðiligu støðuni í havinum, og tá samstundis verður havt í huga, at støðan hjá ávísum bjargafuglum uttan iva er sera álvarsom, metir meirilutin, at tað eigur at vera farið undir hesar kanningar.

Meirilutin heldur tað vera beinast, at hetta kanningarprojekt verður sett í verk innan fyri karmarnar av fiskirannsóknarstovuni, ið hevur umsitið tær lomvigateljingar, sum higartil eru gjørdar í Føroyum.

Út frá hesum setir meirilutin fram fylgjandi

I U p p s k o t

til

samtyktar

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta í verk regluligar og skipaðar kanningar av føroysku sjófuglastovninum.

2. Álagt verður landsstýrinum at útvega sær neyðturviliga játtan til omanfyri nevndu kanningar.

Sami meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Øssur av Steinum, Ingrið Sondum) heldur, at upprunaliga hugskotið hjá serkønum nevndum, merkir í tingmáli nr. 25/1988 um veiðuloyvi er áhugavert og eigur at verða kannað nærri.

Meirilutin setir tí fram fylgjandi

II U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikarnar fyri at seta í gildi reglur um veiðiloyvi og nýtslu av byrsu til veiðu.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur sum heild undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur nøkur broytingaruppskot, fyri at lógin kann virka smidligari og gera størri gagn fyri fulgalívið í Føroyum.

Minnilutin hevur hesar viðmerkingar til tær einstøku greinarnar.

§ 5, 1. stk.:

Orsøkin til, at sýslumaðurin verður nevndu einsamallur, er, at gongdin gerst alt ov drúgv og trupul, um farast skal til fleiri stovnar at biðja um loyvi.

2. stk. At fuglastovnurin á einum ávísum lendi (bergi ella urð) er hóttur av øðrum fuglastovni, merkir ikki altíð, at fuglastovnurin sum heild er hóttur. Hesin trupulleiki er so mikið staðbundin, at tað er skilabetri, at lokalur myndugleiki skipar fyri minking av tí hóttandi fuglaslagnum.

3. stk. Bygdarráðið skal sjálvandi takast við, tí tað er valla hugsandi, at Føroya Náttúrugripasavn av sínum eintingum fer at skipa fyri nakrari týn-

ing, tíansheldur bera kostnaðin av hesum.

§ 6. 1. stk. tekur minnilutin undir við meirilutanum.

6. stk. Tað má verða rætt at hava fyriskriftir í lógini um omanfleyg og heilufugl.

§ 11: Tað er sera umráðandi, at lomvigin eins og hin bjargafuglurin fær frið, tá hann kemur at landi. Tí verður uppskot samsvarandi hesum sett fram.

§ 12: Lomvigi/álka:

Sum kunnugt kemur búfúglurin at landi longu á pálsmessu (25. januar). Samtært kanningum er tað serliga búfuglurin, ið verður skotin teir fyrstu mánaðarnar av árinum (sí "sjómaðurin" nr. 2/1971). Tí verður sett fram uppskot um, at skjótingartíðin eigur at vera úti í. februar. Viðvíkjandi fleyging er tað at siga, at hesin veiðihættur ikki hóttir nakran bústovn. Haraftrat er hetta ein mentannarligur spurningur. Lomvigafleyg er ein týðandi táttur í okkara bjargasøgu- og mentan. Verður friðingin longd í nógv ár afturat, er vandi fyri, at tann parturin av okkara siðaarvi, sum lomvigafleygingin er, dettur niðurfyri med alla.

Lundin: Lundatíðin avmarkar seg sjálv. Tað er ymist, sum fleygatíðin er á teimum ymisku plássunum. Vanliga verður fleygað frá hálvum juni til stutt eftir ólavsøku - so leingi nakað er at fáa. Tí skuldi tað ikki verið neyðugt at ásett eitt ávist tíðarskeið til at fleyga lunda í.

Havhestur, ryta og skarvur:

Tað er nógv til av hesum fuglasløgum, (serliga av havhesti), so tað er eingin orsøk til at friða hesi.

Likka, fiskimási, bakur, ravnur, kráka, skúgvur og tjógvi:

Hesir eru allir rovfuglar, sum eru til sera stóran ampa fyri heiðafuglin. Heldur ikki er nakar vandi fyri, at hesi fuglasløg skulu týnast, tí tey hava ikki verið friðað í langa tíð, og kortini eru tey í menning.

Út frá hesum verður sett soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 5 í uppskoti landsstýrisins gongur út, og í staðin fyri verður sett sum nýggj:

"§ 5. Sýslumaðurin kann geva loyvi til týning av fugli, ið er til ampa á ávísum økjum, sum t.d. alibrúk og floghavn.
2. stk. Um ein fuglastovnur er til ampa fyri aðrar stovnar, kann grannastevna gera av, um minkast skal um stovnin.
3. stk. Um ein fuglastovnur í ávísum fuglalendi er hóttur av skaðadýrum, t.d. rottum og kettum (útløgukøttum) skal Føroya Náttúrugripasavn saman við bygdarráðnum skipa fyri týning."

2) Sum nýtt 6. stk. í § 6 verður sett:
"Rættin til omanfleyg og

1) § 5 i landsstyrets forslag udgår, og i stedet for indsættes som ny:

"§ 5. Sysselmanden giver tilladelse til udrydning af fugl, der er til ulempe for eks. avlsbrug og flyveplads.
Stk. 2. Hvis en fuglebestand er til ulempe for andre bestande, kan grandestævne bestemme, hvorvidt bestanden skal begrænses.
Stk. 3. Hvis en fuglebestand i bestemt fugleområde er truet af skadedyr f. eks. rotter, katte (vildkatte) skal Færøernes Naturmuseum sammen med bygderåd arrangere udryddelse.

2) Som nyt stk. 6 i § 6 tilføjes:
"Retten til fuglefangst fra skrænten overkant med stangnet og til at

til at taka heliufugl hevur hvør persónur í teirri bygd, sum bjørgini eigur, men eingin uttanbiggja maður."

3) § 10. Verður strikað.

4) § 11. Verður soljóðandi:
"Undir lomvigabjørgum má eingin skjóta nærri enn 3 fjórðingar úr næsta punkti á landi frá 1. februar til og við 31. august.
2. stk. Undir ritubjørgum lundaurð/landi, skarva og við eðuvarp má eingin skjóta nærri enn 1. fjórðing frá 1. februar til og við 31. august.
3. stk. Undir súlubjørgum má eingin skjóta nærri enn 3 fjórðingar frá 1. februar til og við 31. oktober."

5) § 12. Verður soljóðandi:
"Undir framman fyrí nevndu treytum er tað loyvt at veiða hesi fuglasløg og taka ungar/ pisur og egg teirra soleiðis:
Skrápur: Lírar kunnu dregast ella takast við ljósi.
Lomvigi/ Álka: Kunnu

fange fugle ved fjeldets fod, har hver person i den bygd, hvortil fuglefjeldene tilhører, men ingen fremmed (fra anden bygd).

3) § 10. Udgår.

4) § 11 formuleres således:
"Under lomviefjelde er skydning nærmere end 4 sømil fra punktet nærmest land fra 1. februar til og med 31. august forbud.
Stk. 2. Under ritefjelde, tilholds-/ynglepladser for søpapegøjer, skarv og ederfugle er skydning nærmere end 1 sømil fra 1. februar til og med 31. august forbudt.
Stk. 3. Under sulefjelde er skydning nærmere end 3 sømil fra 1. februar til og med 31. oktober forbudt."

5) § 12 formuleres således:
"Under forudgående betingelser er det tilladt at fange disse fuglearter, deres unger og æg således:
Skrap: Skrapunger kan drages ud af reden eller fanges med lygte.
Lomvie/alke: Må skydes

skjótast frá 1. september til 1. februar og fleygast fría 1. juni til 31. august.
Lundi: Kann fleygast alt árið, skjótast í tíðini 1. september til og við 14. mars.
Súla: Omplar kunnu slást í ávísum rókum í Mykineshólmi.
Havhestur og Rita: Kunnu fleygast og skjótast alt árið.
Skarvur, líkka, fiskimási, bakur, ravnur, kráka, skúgvur og kjógvi: Kunnu skjótast alt árið."

fra 1. september til 1. februar og fanges med stangnet fra 1. juni til 31. august.
Søpapegøje: Kan fanges med stangnet hele året, skydes i perioden 1. september til og med 14. marts.
Sule: Suleunger må ihjelslås med kæp i nærmere (efter sædvane) bestemte fuglehylder i Mykines-holm.
Stormfugl og ride: Må fanges med net og skydes hele året.
Skarv, stormåge, fiskemåge, svartbak, ravn, krage, storkjove og kjove: Må skyldes hele året."

Ein annar minniluti (Johs. M. Olsen) tekur støðu í tingsalinum.

UMHVØRVISNEVNDIN, 6. september 1988.

Jóannes Dalsgaard Øssur av Steinum Hans Jacob Debes

Johannes Martin Olsen Anfinn Kallsberg

Óli Breckmann,
løgtingsmaður.

Føroya løgting.

Løgtingsmál nr. 26/1988: Ókeypis rætting av tonnum hjá børnum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at bera so á bandi, at foreldur at børnum í skúlaaldri sleppa undan at rinda tær ovurstóru útreiðslur, ið standast av at fáa tenn hjá børnum rættaðar.

Viðmerkingar:

Vanlig tannarøkt er í dag ikki kostnaðarmiklari enn so, at fólk flest velja at halda tenninar viðlíka sum best. Talið á tannlæknum og býtið av tannlæknadømum er soleiðis, at tænastan fevnir allar borgarar í landinum.

Men ein partur av tannarøktini liggur enn á láni, og tað er rætting av tonnum hjá børnum. Ymiskt er, sum føroyskar kommunur gjalda foreldrum aftur fyri hesa tannarøktartænastu. Sumstaðni bera foreldrini størsta partin av kostnaðinum, og har kostar vanlig ramma fleiri túsund krónur.

At hava beinar tenn er grundleggjandi fyri tannaheilsuna, og tað er órættur móti børnum, sum tey vaksa til, at figgjarligar orsøkir forða teimum í at vera errin av tonnunum, tí tær eru skeivar og tí ofta truplari at røkja.

Í okkara framkomna samfelag hevur heilsutænastan skyldu til í sama mun sum við aðrari tannarøkt at bera kostnaðin av, at

tenn hjá børnum verða rættaðar í ungum árum. Samfelagnum kemur tað til gagns við lægri útreiðslum av tannarøkt seinni, um rætting av tonnum hjá børnum bíliga fyri foreldrini er grundleggjandi krav, vit seta okkum sjálvum sum vælferðarsamfelag.

Grundreglan má vera, at figgjarligar orsøkir hjá foreldrum ikki forða børnum í at fáa skeivar tenn rættaðar.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988

Óli Breckmann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 26/1988: Ókeypis rætting av tonnum hjá børnum.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð 3. september 1988 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er greið yvir, at tað leingi hevur elvt til trupulleikar í ávísum kommunum. Nevndin hevur áður viðgjørt málið, eins og landsstýrið hevur borið so í bandi, at bati er farin fram. Í løtuni er støðan hon, at tey børn, ið hava álvarsamast tannastøðu fáa útreiðslurnar goldnar av almannastovuni uttan mun til inntøku hjá foreldrunum. Har tannastøðan er minni álvarsom, verður hjálp veitt eftir inntøku foreldranna. Har talan er um kosmetisk brek, er støðan fyribils hon, at foreldrini mugu gjalda alt. Hetta við kostmetiskum breki verður tó altíð ein metingarspurningur.

Annars er at siga, at vend er komin í sum heild. Tannlæknafelagið arbeiðir í løtuni við málinum, og uppskot er gjørt har av serkønum í tannlæknafelagnum. Hetta uppskot kemur til viðgerðar í tannlæknafelagnum á aðalfundi í september í ár.

Eisini er tað hent, at Tórshavnar kommuna saman við Føroya kommunufelag arbeiðir við at finna eina felagsloysn.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Av omanfyri nevndu orsøk setir meirilutin í nevndini (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov og Adolf V. Hansen) einki uppskot fram, meðan minnilutin (Eilif Samuelsen og Jógvan Sundstein) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar.

ALMANNA- og HEILSUNEVNDIN, 6. september 1988.

Karin Kjølbro Jákup Lindenskov Adolf V. Hansen

Jógvan Sundstein Flemming Mikkelsen

Oli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 27/1988: Uppskot til samtyktar um lækking av skattatrýsti.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við arbeiðsmarknaðin sum miðja ímóti at steðga lønarvøkstrinum við at lækka skattatrýstið tilsvarandi.

Viðmerkingar:

Føroyski búskapurin, útflutningsvinnan og framleiðsluvinnan til heimamarknaðin hava við verandi føroyska lønarlagnum ongan livandi kjans at klára seg í kapping við útlendska framleiðslu.

Rakstrar- og framleiðslukostnaðurin í Føroyum er hækkaður ovurhonds nógv farna valskeið, serliga eftir 10% avgjalds og tískil lønarhækking í fyrraárið og í fjør.

Framhaldandi herðing av skatta- og avgjaldstrýstinum við harav hækkandi lønarkrøvum til vinnulívið, sum síðan hækkar kostnaðarstøðið, endar úti í búskaparligum óføri.

Um landsstýrissamgongan tekur hetta uppskot til eftirtektar og vendir sær til partarnar á arbeiðsmarknaðinum um lønarbata við linking í skattatrýstinum, verður tvífaldur vinningur av hesum:

Í fyrra lagi fæst reallønarbati uttan lønarvøkstur, og í øðrum lagi verður almenna nýtslan tálmað av lægri inntøku. Á

henda hátt fær føroyski almenningurin eitt part av tí peningi aftur, sum landskassin hevur lagt hald á hetta farna valskeið.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 27/1988: Uppskot til samtyktar um lækking av skattatrýsti.</u>

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass, Agnar Nielsen og Heini O. Heinesen) tekur í prinsippinum undir við tankanum í uppskotinum, men metir at stundir ikki eru at viðgera málið nú og setir sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskoti Óla Breckmanns og mælir til, at hetta verður samtykt.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

Óli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 28/1988: Uppskot til samtyktar um hækking av persónsfrádráttinum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at broyta skattalóggávuna soleiðis, at persónsfrádrátturin verður hækkaður við kr. 1.000,- undir teirri treyt, at skattgjaldarin nýtir henda pening til vælgerandi endamál.

Viðmerkingar:

Fjøldin av føroyingum vildu fegin stuðlað einum ella fleiri av teimum nógvu feløgum, sum eru stovnað við einum hjálpandi ella heilsubøtandi endamáli, men limaskapur í hesum feløgum kostar ofta meir, serliga tá talan verður um fleiri limagjøld, enn fólk við vanligum inntøkum hava ráð til.

Um persónsfrádrátturin í skattinum verður hækkaður við 1.000 kr., hevði hendan upphædd, spard í skattarokningini, rokkið til eini 10 limagjøld árliga, og ósjálvsøkna vælgerðararbeiðið hjá hesum feløgum hevði fingið stórt gagn av hesum uppskoti.

Ráðiligt er tó, at landsstýrið skrásetir feløg, ið kunnu verða viðurkend eftir komandi lóg, og at Líkningarvaldið fær prógv fyri, at frádrigni peningurin veruliga er farin til endamálið.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 28/1988: Uppskot til samtyktar um hækking av persónsfrádráttinum.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein samd nevnd ikki undir við málinum.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

Óli Breckmann
Løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 29/1988: Hækking í prísum á íðnaðarfiski

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um hækking í prísum á íðnaðarfiski.	Lagtingslov om forhøjelse af priser på industrifisk.
§ 1. Íðnaðarvirkið Havsbrún í Fuglafirði sleppur undan at gjalda eyka avgjald uppá 50 oyru kilo av olju.	§ 1. Industrivirksomheden Havsbrún, Fuglefjord fritages for ekstraafgift på 50 øre pr. kilo af olie.
§ 2. Sparda upphæddin av § 1 verður at nýta til at hækka tilsvarandi prisin á íðnaðarfiski.	§ 2. Det opsparede provenu i medfør af § 1 anvendes i tilsvarende omfang til at forhøje prisen på industrifisk.
§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hvørja ferð, Havsbrún kunnger prísáseting á íðnaðarfiski, ger virkið vart við, at prísirnir høvdu verið 4-5 oyru hægri pr. kilo, um virkið slapp undan at lata serliga oljuavgjaldið til landskassan.

Føroyski nótaflotin hevur nú triðja árið á rað ikki nóg stóra inntøkur til rentur og avdráttir. Manningainntøkurnar fullu úr 204.000 kr. í 1986 niður í 141.000 kr. í fjør í miðal.

Nótaskipini høvdu klárað seg betur fíggjarliga, og manningarnar fingið meir úrtøku, um oljuavgjaldið, Havsbrún letur landskassanum, fleiri miljónir krónur árliga, kundi komið fiskaprísunum tilgóða.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 29/1988: Hækking í prísum á ídnaðarfiski.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Ivan Johannesen) vísir á, at uppskotið er í samsvar við tey sjónarmið sambandsflokkurin hevur ført fram og lagt uppskot fyri løgtingið í seinastu tingsetu og kann sostatt taka undir við fyriliggjandi uppskotið.

Minnilutin (Poul Michelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988.

Jørgen Thomsen	Asbjørn Joensen	Signar Hansen
Adolf V. Hansen	Ivan Johannesen	Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen

Óli Breckmann,
Løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 30/1988: Avtøka av avgjaldi á blýfríum bensini.

u p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið áleggur landsstýrinum at avtaka serliga avgjaldið á blýfríum bensini.

Viðmerkingar:

Í fleiri londum er tað eitt lógarkrav í sambandi við umhvørvisverju, at bilar hava katalysator - og harvið eru ætlaðir til blýfrítt bensin. Í stuttum merkir hetta, at fyri tað fyrsta er blýfría bensinið sera lítið dálkandi, og við nýtslu av katalysatori er talan at kalla um onga dálking frá bilunum.

Stórir býir á amerikanska og partvíst europeiska meginlandinum hava ómetaliga góðar royndir við nýtslu av blýfríum bensini og katalysatorum á bilum, men trupulleikin er at talan er um stórar íløgur hjá oljufeløgunum, um tey skulu liggja á goymslu við og selja hetta bensin.

Kortini kann blýfrítt bensin nú keypast í øllum grannalondum okkara, tí myndugleikarnar hava heilt einfalt avtikið avgjøld á blýfríum brensini. Í flestum førum er blýfría bensini enntá bligari enn vanliga bensinið, til tess á tann hátt at fáa sum flest fólk at nýta tað og harvið verja umhvørvið sum best.

Sum frálíður koma fleiri og fleiri bilar til landið við katalysator, og eru teir tí ætlaðir til blýfrítt bensin. Sum er

verður katalysatorurin og tann útgerð, sum hartil hoyrir, avmonterað í Føroyum, tí hon ferst av blýbensininum.

Oljufeløgini hava alment úttalað seg um íløgur upp á omanfyri 50 mill., um tey skulu selja blýfrítt bensin á jøvnum føti við vanligt bansin. Harvið verður blýfrítt bensin fleiri krónur dýrari literin, minst hálva ferð dýrari.

Einasti møguleiki er tí at kompensera meirkostnaðin við at lækka avgjaldið á bensini, ella heilt at taka tað av til tess at fáa prisin á blýfría bensininum niður á sama støði sum á vanliga bensininum, helst longur niður.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Óli Breckmann
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 31/1988: Skattalætti fyri inntøkur av útleiging.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, verður gjørd hesa broyting:
Sum nýggj § 60, 3. stk verður sett:

"Undantikin frá skattskyldugari inntøku eru inntøkur, ið stava frá at leiga út íbúðir og kømur til 40.000 kr. árliga."

§ 2.

Hesa lóg fær gildi beinanvegin.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov on landsskat og komuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 fra 1. september 1983 om landsskat og komuneskat med senere ændringer, foretages denne ændring:
Som ny § 60, stk. 3 indsættes:

"Undtaget fra den skattepligtige indkomst er indtægter der hidrører fra udlejning af lejligheder og værelser op til kr. 40.000 årligt.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Neyvan nakað lan í heiminum hevur so stóra húsarúmd pr. íbúgva sum Føroyar. Siður er at byggja 120 m² ein-familjuhús í tveimum hæddum. Hesin byggihátturr gevur nógva húsarúmd til avlops, sum liggur ónýtt, tí leiguinntøka verður skattað oman á vanliga inntøku.

Á størri plássum í landinum, serliga í høvuðstaðarumráðnum, er húsaneyð, tí eftirspurningurin eftir íbúðum til ung hjún og eftir kømurum til ungfólk í útbúgving er størri enn útboðið av bústaðarrúmd.

Við at samtykkja hetta uppskot um skattafrítøku fyri leiguinntøkur upp til 40.000 kr. árliga hevði løgtingið ivaleyst eggjað húsaeigarum við góðum og væl nýtiligum avlopsplássi til at leiga part av annars undirútnyttaðum sethúsum út.

Trýstið á leigumarknaðin hevði lætnað, íbúðarstøðið hevði hækkað av størri útboð av búplássi til leigu, og húsaleigan hevði fallið.

Hetta uppskot hevði tí gagnað bæði sethúsaeigarum, sum ynskja sær ískoytisinntøku frá útleigan til at stuðla afturgjalding av nýggjum húsum, og leigarum, sum høvdu fingið betri leiguumstøður, lægri leigugjald at dragast við, meðan tey royna at spara upp til egin sethús.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 31/1988: Skattalætti fyri innrøkur av útleiging.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og tekur nevndin ikki undir við fyriliggjandi uppskoti og setir sostatt einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1989.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

Uli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 32/1988: Skattafrádráttur fyri leigugútreiðslur til býli.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið áleggur landsstýrinum at føra inn í skattalógina serligan frádrátt fyri leigugútreiðslur av býli, 10.000 kr. árliga.

Viðmerkingar:

Um 85% av føroyingum búgva heima hjá sær sjálvum, og er sjálveigaraskipanin av egnum býli ein bústaðarháttur, vit mugu halda fast um.

Men ikki skerst burtur, at part av lívinum búgva fólk, ofta nýgift við smáum børnum, til leigu, meðan tey baksast við at seta føtur undir egið borð.

Tungt er fíggjarliga at fáa tak yvir høvdið, serliga um húsaleigan leggur hald á fittan part av inntøkuni hjá ungum familjum.

Tí verður skotið upp at leggja inn í skattalógina serligan frádrátt, t.d. 10.000 kr. árliga, soleiðis at tað verður lættari hjá nýstovnaðum familjum við smáum børnum at spara upp til egin hús.

Hóast uppskotna upphæddin kann tykjast heldur lág, stendur tinginum frítt at áseta hægri frátrátt. Tó eigur at havast í huga, at tað altíð má vera fyrimunur hjá fóiki at búgva undir egnari lon, og at sjálveigaraskipanin verður tryggjað

best, við ikki at gera leigufrádráttin so høgan, at tað er lættari at búgva til leigu enn inni hjá sær sjálvum.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 72/1988: Skattafrádráttur fyri leiguútreiðslur til býli.</u>

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið. Ein samd nevnd tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram. Tó vísir Agnar Nielsen til uppskot sambandsflokksins í sama málið.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

Óli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 33/1988: Uppskot til samtyktar um hálvt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving.

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at pensonistar og fólk undir útbúgving bert skulu rinda hálvt útvarps- of sjónvarpsgjald.

Viðmerkingar:

Striltið er oftast hjá fólki við niðursettari inntøku, serliga ungfólki í útbúgving og fólkapensionistum, at fáa endarnar at røkka saman, tá allar fíggjarligar skyldur eru røktar.

Serliga eldri fólk stytta sær stundir og hjálpa sær úr einseminum við at lurta eftir útvarpi og hyggja at sjónvarpi. Men at gjalda eina hálva mánðarpensión í útvarps- og sjónvarpsgjaldi er meir, enn hitt almenna, sum hevur ábyrgd av hesum báðum tíðindamonopolum kann vera tjent at krevja inn frá lægsta og veikasta inntøkubólki.

Ungfólk í útbúgving eru í somu inntøkuveiku støðu, tí tey ofta liva uttan lønt arbeiði.

Tí verður skotið upp fyri løgtinginum, at Útvarps- og sjónvarpsgjaldið hjá pensionistum og ungfólki í útbúgving verður lækkað niður í helvtargjald.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Óli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 34/1988: Stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum uttanlands.

Uppskot

til

løgtingslóg um stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita stuðul upp til 2.000.000 kr. til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum og ferðir í hesum viðfangi.
2. stk. Stuðulin verður at umsita av 3-mannanevnd, vald við einum umboði frá hvørjum av hesum feløgum, Fiskimannafelagnum, Skipara- og Navigatørfelagnum og Reiðarafelagnum.
3. stk. Stuðulin verður at seta í grunn, og landsstýrið ger reglugerð fyri grunnin.

lagtingslov om tilskud til undersøgelser af nye fiskerierhvervsmuligheder.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at yde tilskud på op til kr. 2.000.000 til undersøgelser af nye fiskerierhvervsmuligheder og rejseaktiviteter, der er forbundet hermed.
2. stk. Tilskuddet administreres af et 3-mands udvalg, der er valgt med en repræsentant fra hver af følgende fællesskaber, Fiskerforeningen, Skipper- og Navigatørforeningen og Rederiforeningen.
3. stk. Tilskuddet henlægges i fond, for hvilken landsstyret udfærdiger reglement.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkinga.

Tað er einki dulsmál, at føroysku heimaleiðirnar eru ikki nóg fongríkar til at breyðføða alt Føroya fólk á verandi livistøði. Tí er er neyðugt at líta kring alla havsbrúnna eftir nýggjum fiskivinnumøguleikum, sum kunnu kasta innløgur av sær til føroyska samfelagið.

Landsstýrið er stórt arbeiði áríð runt við at tryggja okkum kvotur og avtalur í útlondum.

Peningatrot darvar skipaeigarum og yrkisfelagskapum at ferðast uttanlands í teimum londum, sum vit náttúrliga kundu havt fiskivinnusamstarv við. Ein grunnur sum hesin í uppskotinum hevði givið monnum, ið hava gott skil á samstarvsmøguleikum, eitt høvi til at slóða nýggjar leiðir.

Í reglugerð fyri grunnin eigur grundleggjandi krav at vera, at ferðafrágreiðing fyriliggur altíð, tá hann verður nýttur at stuðla kanningarferðum.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 34/1988: Stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum uttanlands.

Málið er framlagt av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Adolf V. Hansen, Ivan Johannesen, og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og getir einki uppskot fram.

Minnilutin (Poul Michelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988.

Jørgen Thomsen Signar Hansen Asbjørn Joensen

Adolf V. Hansen Ivan Johannesen Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen

Óli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 35/1968: Rentuágóðin av innistandandi frítíðarpeningi til løntakarar.

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið uppskot um broyting í løgtingslóg um frítíðarløn, soleiðis at tað framvegis verður løntakarin persónliga, og ikki sum nú fakfeløgini, sum fáa ágóðan av rentutilskriving av innistandandi frítíðarløn.

Viðmerkingar:

Føroyski løntakarin er fyri inntøkumissi hvørt ár, tí tann frítíðarpeningur, løntakarin eftir lógini eigur tilgóða sum prosentpartur av løninni, kemur fakfeløgunum og ikki løntakaranum persónliga tilgóða.

Hetta eigur at verða broytt soleiðis, at hin einstaki fær fullan fyrimun av rentuni av tí frítíðarpeningi, hann sjálvur og ikki yrkisfeløgini fáa sambært lóg um frítíðarløn.

Har løntakarin ikki stendur í yrkisfelag, fellur rentutilskrivingin til frítíðargrunnin hjá Líkningarráðnum, t.e. ein inntøka hjá landskassanum.

Løntakarin persónliga eigur sjálvandi eisini rætt til hendan rentuágóða.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Óli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 36/1988: Uppskot um dagføring av hagtølum.

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fyri eitt at syrgja fyri dagføring av hagtølum yvir atvinnuatstøður Føroya fólks.

Viðmerkingar.

Í landsstýrisins og ríkisumboðsins ársfrágreiðing sæst, at eingi feskari hagtøl eru yvir býtið millum vinnubólkarnar enn árið 1977.

Hesi hagtøl eru nú so ótíðarhóskandi, at tað ikki longur er gjørligt hjá politikarum ella almenningi at hava nakra hóming av, hvussu útviklingurin hevur verið í vinnubýtinum í hesum samfelag. Sama er galdandi fyri bústaðarhagtøl, hóast 3.500 sethús eru bygd síðan 1977, t.e. 1/4 av øllum setbúsum í landinum.

Landsstýrisins Hagdeild er væl mannað við serfrøðingum, og tí má tað vera eitt rímiligt krav til landsins fyristing, hvørs rakstrarkostnaður er tvífaldaður hetta valskeið, at løgtingsmenn og onnur, ið hava hesi vinnuligu býtishagtøl og bústaðarhagtøl fyri neyðini, kunnu fáa tey upplýst.

At kenna dagførda býtið millum vinnuligu og almennu búskaparbólkarnar frá ári til árs er grundleggjandi krav til eitt og hvørt toliliga framkomið samfelag.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Óli Breckmann,
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 37/1988: Uppskot til samtyktar um stovnseting av blaðmannaútbúgving í Føroyum.

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri, at sett verður á stovn blaðmannaútbúgving í Føroyum.

Viðmerkingar:

Nú skúlaverkið er so væl útbygt her á landi, mátti borið til hjá føroyingum, sum ynskja at læra blaðmannayrkið, at fingið minst ein part av hesi útbúgving her á landi.

Ein partur av blaðmannaútbúgvingini eigur tó enn at nemast uttanlands, lutvíst tí vit ikki enn eru før fyri at bjóða fullfíggjaða útbúgving av hesum slag, men eisini lutvist tí blaðfólk í læru hava gleði og gagn av at nema part av læruni í einum av grannalondum okkara.

Blaðmannaútbúgvingin hevði komið føroysku tíðindatænastuni og fjølmiðlum okkara tilgóða. Upplýsingarstøðið hevði hækkað.

Men eisini eigur løgtingið at hava í huga, at alsamt fleiri fyritøkur, felagskapur, virki og stovnar kundu hugsað sær og hava fyri neyðini at venda sær við tíðindum og marknaðarføring til viðskiftafólk í Føroyum og uttanlands. Størri tal av blaðfólki til taks hevði styrkt marknaðarføringina hjá føroyskum vinnulívi.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

1

<u>løgtingsmáli nr. 37/1988: Uppskot til samtyktar um stovnseting av blaðmannaútbúgving í Føroyum.</u>

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni 2. september 1988 og varð eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint til viðgerðar í skúla- og mentamálanevndin.

Málið snýr seg um at áleggja landsstýrinum at seta á stovn blaðmannaútbúgving í Føroyum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) kann taka undir við, at tørvur er á blaðmannaútbúgving í Føroyum.

Undir 1. viðgerð varð upplýst, at myndugleikarnir saman við ávísum skúla arbeiða við at seta á stovn blaðmannaútbúgving í Føroyum. Meirilutin heldur tí onga orsøk vera at samtykkja uppskotið frá Óla Breckmann og setir tí einki uppskot fram.

Ein minniluti (Óli Breckmann) mælir til at samtykkja uppskotið óbroytt.

Ein annar minniluti (Eilif Samuelsen) mælir til, at blaðmannaútbúgving verður stovnsett undir Fróðskaparsetri Føroya.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 5. september 1988.

Jóannes Dalsgaard Hergeir Nielsen Asbjørn Joensen

Eilif Samuelsen Óli Breckmann

Óli Breckmann
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 38/1988: Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um sjálvboðna uppsparing við skattafrádrátti.	lagtingslov om frivillig opsparing med skattefradrag
§ 1. Persónar undir fullari skattskyldu í Føroyum kunnu hvørt inntøkuár seta inn á serliga bundna konto í føroyskum peningastovni upp til kr. 10.000 og draga upphæddina frá skattskyldugu inntøkuni sama ár, hon er inngoldin.	§ 1. Personer der har fuld skattepligt på Færøerne kann for hvert indtægtsår indsætte op til kr. 10.000 på særlig bunden konto i færøsk pengeinstitut og fradrage dette beløb i den skattepligtige indtægt samme år, indbetalingen er foregået
§ 2. Verða tær einstøku inngoldnu upphæddirnar tiknar út, áðrenn 4 ár eru liðin eftir inngjalding, verður frádrigna upphæddin tald upp í skattskyldugu inntøkuna tað árið, peningurin verður úttikin.	§ 2. Såfremt de enkelte beløb hæves inden 4 år efter foretagen indbetaling, skal det fratrukne beløb medregnes i indtægten det samme år, om beløbet er hævet

§ 3. Frá fimta ári, eftir at skattgjaldari er byrjaður at spara upp eftir hesi skipan, verður loyvt at taka út av bundnu kontoini bert upphædd, svarandi til upphæddina fyrsta innsetingarárið, uttan so at úttikna upphæddin verður nýtt til:

1. Íløgu í nystovnað virki skattgjaldarans.
2. Íløgu í nýkeypt bethús, til egna nýtslu og bert eina ferð.
3. Nýtast til at gjalda útreiðslur í samband við útbúgving, sum tekur minst 2 ár at fullføra.
4. Úttøku 5 ár eftir innsetingardagin.

§ 3. Efter det femte år at skatteyderen har påbegyndt opsparing i henhold til denne ordning, er det kun tilladt at hæve så meget af den bundne konto, der modsvarer beløbet det første indskudsår, dog med undtagelse for at det hævede beløb er anvendt til:

1. Investering i en af skatteyderen nyetableret virksomhed.
2. Investering i nykøbt beboelsesejendom til eget brug og kun een gang.
3. Anvendes til at betale udgifter i forbindelse med uddannelse, der kræver en uddannelsestid på mindst 2 år.
4. Hævelse af beløb, der har været indsat på konto i mindst 5 år.

§ 4. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 4. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Uppskotið hevur tvinni endamál:

Í fyrra lagi at styrkja uppsparingina í føroyska samfelagnum og harvið at økja evni Føroya at eginfíggja vinnulívið.

Í øðrum lagi at styrkja vinnuliga og einstaklinga táttin í búðskapinum mótvegis tí almenna.

Tann lagaligi rentuskatturin, bert 1/2% av 10%, er ryggurin í veldugu føroysku uppsparingini á bók í føroysku peningastovnunum. Meðal føroyingurin eigur um 120.000 kr. á sparibók (meðan danin bert 65.000 kr. smbr. Danmarks Statistik).

Ein lóg, bygd á hetta uppskot til samtyktar, hevði eisini økt evni føroyinga til at átaka sær størri part av vinnuligu íløgunum í føroyska búskapinum. Hesar íløgur vóru undanfarnu 4 ár úti við 6 mia. kr., harav 2 mia. kr. vórðu lántar uttanlands, meðan 4 fingust til vega innansyndis.

Ovurhonds stóru vinnuligu íløgurnar - 130.000 kr. pr. íbúgva í miðal (móti bert 65.000 kr. í Danmark) - hava økt uttanlandsskuld Føroya í so mikið.

Ein økt uppsparing á bók í føroyskum peningastovnum hevði styrkt fíggjannarorku føroyska samfelagsins við eini tveimum hundrað milj. kr. eyka um árið.

Búskapurin er spentur í løtuni og verður tað helst eina tíð fram. Til tess at stovnfesta búskapin hevði ein uppsparingarlóg sum henda munað betur enn tilsvarandi inntøka av peningi í landskassan ella í almennar grunnar.

Um leysliga helmingurin av skattgjaldarum landsins kunnu hugsast at nýta henda møguleika at spara upp við skattafrádrátti, hevði lógin givið peningastovnum okkara eina eyka innskotsupphædd upp á 150 milj. kr. árliga.

Við 30% í meðal landsskattlegging av seinastu 10.000 kr. missir løgtingið um 50 milj. kr. í skattainntøku árliga.

Eina mestauppnædd javnbjóðis fyri øll uppá 10.000 kr. hevur tann fyrimun, at hon kemur øllum inntøkubólkum javnt tilgóða sum uppsparing og skattafrádráttur - tað ein hevur ráð til at lata í skatti, hevur ein eisini ráð til at seta á bók - meðan ein upphædd sum prosentuellur partur av ársinntøkuni við skattafrádrátti hevði komið teim størru inntøkunum meiri tilgóða ein teimum smáu.

Fyri innskjótarar hevði ein 10.000 kr. uppsparing árliga við rentutilskriving eftir trimum árum givið út við 40.000 kr. innistandandi.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. SEPTEMBER 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 38/1988: Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass, og Heini O. Heinesen) ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við fyriliggjandi málinum, og vísir á uppskot fólkafloksins um sjálvboðna uppsparing.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur undir við málinum og vísir á uppskot sambandsfloksins um tvungna uppsparing.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

Óli Breckmann
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 39/1988: Stuðul til oyggjaleikirnar í Føroyum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um stuðul til oyggjaleikirnar í Føroyum í 1989.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita stuðul upp til kr. 2.000.000,- til oyggjaleikirnar í Føroyum í 1989.
2. stk. Stuðulin verður í fyrsta lagi at nýta til neyðugar valla- og hallaíløgur, annars til rakstrarstuðul.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

lagtingslov om tilskud til øsportsstævnet på Færøerne i 1989.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at yde et tilskud på op til kr. 2.000.000,- til øsportsstævnet på Færøerne i 1989.
Stk. 2. Tilskuddet skal primært anvendes til nødvendige investeringer vedr. baner og haller, sekundært til driften.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelse.

Viðmerkingar:

Tað kostar ítróttarfeløgunum í Føroyum stóran pening at vera vertir til altjóða oyggjaleikirnar komandi ár.

Ítróttarfeløgini hava mist ein hentan inntøkumøguleika, tí hetta landsstýrið hevur sýtt fyri at strika lógina um ítróttarvedding, soleiðis at føroysk feløg aftur fingu loyvi at søkja donsku Tipstænastuna og taka ímóti stuðuli í sama mun, sum føroyingar tippa í Danmark.

Tí sjálvt um løgtingslóg forðar føroyingum at fáa styrk frá Tipsfonden, so tippa føroyingar líka nógv sum áður hjá donsku Tipstænastuni.

Hesa tvístøðu komu vit í, tá løgtingið í góðari ætlan samtykti lóg um føroyska ítróttarvedding, sum skuldi erstatta og yvirganga í vinningi ta donsku stuðulsskipan, Tipstænastan tilluteði føroyskum ítrótti og øðrum felagsskapum.

Ítróttarvedding datt tíverri niðurfyri, og vit fingu einki í staðin. Harafturímóti mistu vit í báðum førum.

Til at samsýna føroyskum ítróttarfeløgum missin frá Ítróttarvedding og Tipsfonden verður skotið upp, at løgtingið ásetir eina upphædd, t.d. 2.000.000 kr. til at stuðla føroyskum ítróttarfeløgum við íløgum, sum eru neyðugar ella koma væl við til oyggja-OL í 1989.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 39/1988: Stuðul til oyggjaleikirnar í Føroyum.

Málið er framlagt av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Samd nevnd vísir á, at umsókn um stuðul til oyggjaleikirnar er til viðgerðar í landsstýrinum og setir ti einki uppskot fram.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988.

Jørgen Thomsen Signar Hansen Asbjørn Joensen

Adolf V. Hansen Ivan Johannesen Flemming Mikkelsen

Poul Michelsen

Óli Breckmann
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 40/1988: Skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna trúðboðarum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Sum nýggj § 33, nr. 13 verður sett:

"Gávur, ið givnar verða til frama fyri føroyskt ella útlendskt trúboðaravirksemi, ið útint verður í Føroyum ella uttanlands."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

Som ny § 33, nr. 13 indsættes: "Gaver, der ydes til færøsk eller udenlandsk missionsvirksomhed på Færøerne eller i udlandet."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelse.

Viðmerkingar:

Fólkakirkjan, missiónin og trúarsamkomur okkara røkja umfram eitt kristniboðaraarbeiði eina umfatandi samfelagsliga tænastu, sum aldri kann gerast upp í krónum og oyrum.

Eitt fjølment lið av føroyingum sum eftir at hava givið keisaranum (t.e. tí almenna) tað, ið tí tilkemur, letur dyggan fíggjarligan stuðul til kirkjur og samkomur sínar.

Ein týðandi partur av trúararbeiðinum er kristniboðanin, sum verður røkt av okkara egnu og stundum vitjandi útlendskum trúboðarum, sum hava eina inntøku fyri neyðini til at liva av.

Galdandi skattalóg áleggur trúboðarum skattskyldu, hóast teirra ofta lítla inntøka er samsýning í form av eini gávu, sum kirkju- ella samkomuliðið savnar inn sínamillum.

Allir tingmenn skilja, hvussu náttúrligt tað skuldi verið at sloppið samkomunum undan av skattaligum ávum at savna dupult so nógv inn at samsýna trúboðarum sínum og vitjandi, sum neyðugt er, fyri at samsýningin skal muna til lívsins uppihald og ferðing til og frá Føroyum.

Okkara kirkju- og samkomulív verður andliga ríkari og røkkur harvið longri í kristniboðanini og sosiala virkseminum, um kirkjulið, missión og fríu samkomurnar høvdu sloppið undan skattskyldu av trúboðarasamsýning, soleiðis at tær gávur, sum innsavnaðar verða, høvdu rokkið dupult so langt, sum tær gera eftir galdandi skattalóg.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988

Óli Breckmann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 10/1988: Skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna tríboðarum.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

Óli Breckmann
Løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 41/1988: Vernd móti uppsøgn orsakað av felagslimaskapi.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um vernd móti uppsøgn orsakað felagslimaskapi.

§ 1. Arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønarmóttakara, tí at hesin er limur av einum felag ella av einum ávísum yrkisfelag.

§ 2. Arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønarmóttakara, tí at hesin ikki er limur av einum felagsskapi ella av einum ávísum yrkisfelagsskapi.
2. stk. Visti lønarmóttakarin við setanina, at arbeiðsgevarin setti krøv um limaskap av einum felag ella ávisarum yrkisfelags-

Lagtingslov om værn mod opsigelse grundet af medlemskab.

§ 1. En arbejdsgiver må ikke afskedige en lønmodtager, fordi denne er medlem af en forening eller af en bestemt fagforening.

§ 2. En arbejdsgiver må ikke afskedige en lønmodtager, fordi denne ikke er medlem af en forening eller af en bestemt fagforening.
Stk. 2. Stk. 1 finder ikke anvendelse, såfremt lønmodtageren ved ansættelsen var bekendt med, at arbejdsgiveren stillede medlemsskab af en forening eller af en bestemt fagforening som

skapi sum treyt fyri arbeiði í virkinum, kann 1. stk. ikki nýtast.
3. stk. Tá lønarmóttakari verður gjørdur kunnugur við, at limaskapurin er ein treyt fyri framhaldi av setanini í virkinum, kann 1. stk. ikki nýtast.

§ 3. §§ 1 og 2 í lógini eru ikki galdandi fyri lønarmóttakarar, sum eru í starvi hjá einum arbeiðsgevara, hvørs virki hevur sum sítt lýsta endamál hevur at fremja ein ávisan politiskan, hugsjónarligan, átrúnaðarligan ella mentannarligan støðu, og viðurskiftini hjá avvarðandi mugu haldast at vera av týdningi fyri virkið.

§ 4. Verður ein lønarmóttakari ímóti §§ 1 og 2 sagdur úr starvi, skal arbeiðsgevarin rinda endurgjald.
2. stk. Endurgjaldi eftir 1. stk., sum ikki kann fara upp um lønina fyri 78 vikur, verður ásett uttan mun til lønarmóttakarans setannartíð og málsviðurskiftini annars.

betinglse for beskæftigelse i virksomheden.
Stk. 3. Stk. 1 finder endvidere ikke anvendelse, når en lønmodtager, der er medlem af en forening, efter ansættelsen gøres bekendt med, at medlemsskabet er en betingelse for fortsat ansættelse i virksomheden.

§ 3. Lovens §§ 1 og 2 gælder ikke for lønmodtagere, der er ansat hos en arbejdsgiver, hvis virksomhed som sit udtrykte formål har at fremme et bestemt politisk, ideologisk, religiøst eller kulturelt standpunkt, og den pågældendes forholdsforhold må anses for at være af betydning for virksomheden.

§ 4. Afskediges en lønmodtager i strid med §§ 1 og 2, skal arbejdsgiveren betale erstatning.
Stk. 2. Erstatningn efter stk. 1, der ikke kan overstige 78 ugers løn, fastsættes under hensyn til lønmodtagerens ansættelsestid og sagens omstændigheder iøvrigt.

§ 5. Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 5. Loven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Hetta lógaruppskot um vernd móti uppsøgn av fólki orsakað av fakfelagslimaskapi er í tráð við ST-mannarættindarreglur og við § 11 í Europeisku konventiónini um mannarættindi, sum ikki bert tryggja øllum borgarum í samfelagnum rættin at skipa seg í fakfeløg, men eisini rættin til at standa óheft av yrkisfelag.

Frælsið at standa óheftur er staðfest í fleiri nógv umtalaðum dómum við mannarættindardómstólin í Strassbourg, hagar fólk leitaðu sær skjól undan fakfelagstvingsuli og uppsøgn úr arbeiði, tí viðkomandi persónar av samvitskugrundum ikki vildu líða undir yvirgangi av diktatoriskum eksklusiv-sáttmálum.

Á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru dømi um eksklusivavtalur, sum skerja menningina á viðkomandi virkisøki, darvandi virkisfrælsið hjá einstaka yrkisfelagslimunum, og sum kostar samfelag og løntakarum pening av verkfallstapum.

Í flestu framkomnu londum verja lógir sum henda lønarmóttakarar móti tvingsli, tryggja lønmóttakarar ímóti uppsøgn orsakað av limaskapi ella ikki-limaskapi í fakfelag. Í Danmark kom lógin í gildi í juni 1982, og legði Svend Auken vegna donsku javnaðarstjórnina tá uppskotið fyri fólkatingið, sum samtykti tað, so tað gjørdist og er nú lóg.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Til Breckmann,
Løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 42/1988: Demokratisering av útvarps-monoplinum.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um demokratisering av útvarpsmonoplinum.

§ 1. Løgtingið velur 9-mannanevnd av sakkønum at kanna og skriva álit um verkætlan til at demokratisera sjónvarps/útvarpsmonopolið.

§ 2. Álit nevndarinnar verður tøkt so skjótt, at landsstýrið kann leggja lógaruppskot fyri tingi í tráð við hesa lóg og eftir tilráðing nevndarinnar í komandi tingsetu.

§ 3. Nevndin verður mannað, so hon umboðar sakkunnleika

Lagtingslov om demokratisering af radiomonopolet.

§ 1. Lagtinget vælger ef udvalg på 9 medlemmer af sagkyndige at undersøge og skrive betænkning om et program til demokratisering af tv/radiomonopolet.

§ 2. Udvalgets betænkning skal foreligge så betids, at landsstyret kan lægge lovforslag for tinget i overensstemmelse med denne lov og i henhold til udvalgets indstilling i kommende lagtingssamling.

§ 3. Udvalget sammansættes således, at det repræsen-

um fjølmiðlar, mentan, útbúnað, búskap og løgfrøði og verður vald eftir vanligum løgtingsútfalsvali.

§ 4. Arbeiðssetningur nevndarinnar er at finna fram til bestu og billigastu sjónvarps- og útvarpsskipan eftir entreprisumodellinum við einum sendineti sum nú og við einum øðrum óheftum sendineti og frægastu fíggjarloysn í báðum førum, eisini møguliga við lýsingarinntøkum.

§ 5. Játtaðar verða upp til 250.000 kr. til útreiðslur ið standast av nevndararbeiðinum.

§ 6. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

tærer sagkyndige for massemedierne teknisk og ved sin saammensætning iøvrigt, kultur, religion, økonomi og jura. Udvalget vælges efter lagtingets regler om forholdstalvalg.

§ 4. Udvalgets kommisorium er at finde frem til den bedste og billigste tv/radioordning efter et entreprisemodel med et sendenet som nu, og med et andet uafhængigt sendenet ogh med den bedste økonomiske løsning i begge tilfælde også med mulige reklameindtægter.

§ 5. Der bevilges opp til 250.000 kr til dækning af udgifter af udvalgsarbejdet.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks

Viðmerkingar:

Tøknifrøðin til útvarping av tíðindum, upplýsing og undirhaldi er so nógv broytt tey farnu 30 árini, síðan Útvarp Føroya varð sett á stovn, at eitt útvarpsmonopol sum hitt føroyska er ein fornleivd.

Øll lond í heiminum uttan tey mest einflokkastýrdu eystan jarntjaldið og summi triðja heimslond hava langt síðan lopyst upp fyri teimum skapandi kreftum, sum lætt atkomilig og bílig sendiútgerð gevur møguleikar at virka frítt.

Vanahugsan og samspæl millum føroyska útvarpsmonopolið og tað til einhvørja tíð sitandi landsstýri eru atvoldin til, at Føroyar og harvið føroyska upplýsingarstøðið eru eftirbátar á hesum týðandi mentunarøki.

Eitki er hildið meir náttúrligt og neyðugt enn ein margfald og fjøltáttað dagspressa, sum í orðsins víðastu merking tryggjar eina demokratiska upplýsingarskyldu, sum vit als ikki kenna til á útvarpsøkinum. Útvarpsmonopolið við lógarfestum einkarrætti at senda tíðindi, upplýsing og undirhald á hendan hátt er ein klæppur um beinið á allari menning á hesum øki.

Uppskotið miðjar ikki móti at leggja Útvarp Føroya niður. Í flestøllum londum virkar ein óheftur tíðindastovnur sum hesin undir almennum eftirliti. Men hesi seinastu árini hevur hann ikki havt einkarrætt og hevur ikki við hesum framihjárætti kunnað forðað øðrum lokan- og nærradioum at virka.

Uppskotið er harafturímóti ætlað at veita øðrum felagskapum, persónum o.ø. javnbjóðis Útvarpi Føroya rætt til at gera líknandi sendingar. Í tráð við vanliga fatan av pressufrælsinum fellur tað tí ivaleyst løgtinginum náttúrligt at taka undir við uppskotinum.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988.

Óli Breckmann.

Á l i g

4

<u>løgtingsmáli nr. 42/1988: Demokratisering av útvarpsmonopolinum.</u>

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í mentannar- og skúlanevndina.

Endamálið við lógaruppskotinum er at játta 250.000 kr. til nevnd, sum skal gera uppskot til annan bygnað fyri útvarp Føroya - enn bygnað, sum avtakur einkarrætt útvarpsins til útvarpssendingar í Føroyum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir nevndarviðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) vísir á, at landsstýrið arbeiðir við einum nýggjum bygnað fyri Útvarp Føroya, og heldur meirilutin tí onga ørsøk vera til at samtykkja uppskotið. Meirilutin setir sostatt einki uppskot fram.

Ein minniluti (Óli Breckmann) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

Ein annar minniluti (Eilif Samuelsen) tekur í høvuðsheitinum undir við uppskotinum um at avmonopolisera og avdemokratisera útvarpið.

Minnilutin setir sostatt fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>samtyktar</u>

Løgtingið heitir á landsstýrið um at seta eina arbeiðsbólk at endurskoða reglugerðina um útvarp Føroya og at leggja uppskot fyri tingið so skjótt sum tilber.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 5. september 1988.

Jóannes Dalsgaard Hergeir Nielsen Asbjørn Joensen

Eilif Samuelsen Óli Breckmann

Óli Breckmann
Løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 43/1988: Broyting í útvarpslógini.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um um broyting í løgtingslóg um útvarp.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp verður § 3, 1. stk. orðað soljóðandi:

"Til útvarpið skal hvørt húsarhald rinda gjald fyri ein radiomóttakara. Sama er galdandi fyri virki, skip, handlar, skrivstovur o.t. Fyri móttakarar í bilur og bátum undir 5 br. reg. tons verður einki gjald at rinda."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1989.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om radio.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 28. marts 1956 om radio affattes § 3, stk. 1 således:

"Til radioen skal hver husholdning svare afgift for een radiomodtager. Det samme er gældende for virksomheder, skibe, forretninger, kontorer o.l. For modtagere i biler og både under 5 br. reg. tons svares ingen afgift."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1989.

Viðmerkingar:

Lógaruppskotið hevur til endamáls at beina burtur skeivleikar í verandi lóg um útvarpsgjald, sum ikki verður fylgd.

Sum tíðindamonopol hevur Útvarp Føroya m.a. frammíhjárætt (eins og Sjónvarp Føroya), at lógin heimilar stovninum at krevja og panta eftir lurtaragjaldi av hvørjum einasta radiotóli í landinum.

Radiohandlar hava skyldu at boða Útvarpi Føroya frá, hvørja ferð eitt móttøkutól verður selt. Í øllum landinum munnu finnast tiggjutúsundtals radiotól, sum eftir galdandi lóg øll eiga at bera hvør sítt lurtaragjald.

Sostatt gongur Útvarp Føroya ikki eftir bókstavinum í lógini, og túsundtals radiotól sleppa undan at bera lurtaragjald.

Útvarp Føroya hevur farnu 10 árini fingið millum helming og 2/3 av samlaðu inntøkum stovnsins frá lurtaragjaldinum (t.d. 1,6 av tilsamans 3,4 mió. kr. í 1976/77 og 14.3 av tilsamans 21,8 mió. kr. í 1987.) Neyvan verður býtið stórvegis broytt ella samlaða inntøka tíðindamonopolsins nógv skerd av hesum uppskoti.

Lurtaragjaldsinntøka Útvarpsins í fjør lá um 14,3 mió. kr. svarandi til um 20.000 radiotól á 700 kr. í gjaldi hvørt. Í Føroyum eru eini 15.000 húsarhald og einar 1300 krambúðir, virki og skrivstovur, sum Útvarp Føroya fær inntøku frá gjøgnum lurtaragjaldið.

Nógv eru tó tey, sum fáa bæði tvey og trý uppkrøv, so antin sleppa summi sær undan at gjalda fyri tað eina, og/ella gjalda onnur fyri meira enn eitt radiotól.

Hetta lógaruppskot miðar móti at broyta verandi lóg um útvarpsgjald, so lógin samsvarar betur veruleikanum, nevniliga at hvørt húski rindar eitt lurtaragjald í staðin fyri at verða kravt eftir einum gjaldi fyri hvørt radiotól, leyst og fast, stórt og lítið, við hús ella í bilinum.

Við hesum uppskoti høvdu vit sloppið undan tí mannamuni, at summi húsarhald sleppa undan at rinda, meðan onnur rinda upp í fleiri.

Harnæst sluppu vit undan tí skeivleika, sum liggur í, at lógir hvørki virka eftir ætlan ella verða fylgdar.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

1

Løgtingsmáli nr. 43/1988: Broyting í útvarpslógini.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen) kunnu ikki taka undir við uppskotinum og seta eitki uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Ivan Johannesen) mælir til at sett verður ein mannanevnd at endurskoða løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956, serliga við atlitið til fíggjarligu viðurskifti stovnsins og setir fram

U p p s k o t

til

samtykkar

Álagt verður landsstýrinum at seta 5 mannanevnd at endurskoða løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956.

Minnilutin (Poul Michelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988.

Jørgen Thomsen Asbjørn Joensen Signar Hansen

Adolf V. Hansen Ivan Johannesen Flemming Mikkelsen

Poul Mikkelsen.

Óli Breckmann
Løgtingsmaður

Føroya løgting.

Løgtingsmál nr. 44/1988: Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og skamtarnarskipanini.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt antin við lógaruppskoti ella í samstarvi við løgregluna at tryggja at galdandi rúsdrekkalóg og harvið reglugerðir um galdandi skamtarnarskipan verða fylgdar.

Viðmerkingar:

Tað hevur leingi ljóðað og er nýliga prógvað, at tað ber til at fáa skattavátttan og skamtarnarkort til rúsdrekka uttan at skula leggja fram legitimatión ella fullgilduga fulltrú.

Tað sigst av royndum at vera gjørligt hjá ungdómi niður til 13 ára aldur, tá tey verða skrásett sum A-skattgjaldarar, at innloysa øl upp til gullstyrki. Møguleiki er somuleiðis til staðar við misnýtslu av gestakortum.

Endamálið við galdandi rúsdrekkalóg, antin hon so verður hildin heppin ella ikki, er júst at fyribyrgja, at komandi er til rúsløg hjá hálvvaksnum og stórum smábørnum í óavmarkaðum nøgdum.

Ovurnýtsla av rúsdrekka millum ungfólk er menniskjaligt og samfelagsligt vandamál, sum Føroya Løgting hevur ábyrgd av at stoðga í tann mun, tað er gjørligt.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 44/1988: Viðvíkjandi rúsdrekkalógini og skamtannarskipanini.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, 5. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í rættarnevndina.

Nevndin tekur ikki undir við uppskotinum, men vísir á skriv dagt. 6. juni 1988 frá landsstýrinum til tollstovuna, sum er hjálagt, har álagt verður tollstovuni og postverkinum at krevja skjalprógv fyri aldur móttakarans, har hetta verður mett neyðugt.

./.

RÆTTARNEVNDIN, 6. september 1988.

Ingrid Sondum Jóannes Dalsgaard Jákup Lindenskov

Jógvan Sundstein Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

r R-110 Tórshavn. 6. juni 1988 F. L. j. nr. 607-11-7
(at tilskila í svari)

Tlf. 11000. Telex 81235 lagm fa. Telefax 14941. Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

AMP/or

Vísandi til skriv tollstovunnar dagfest 19. apríl 1988 viðvíkjandi spurninginum um, hvussu tollstovan og postverkið, tá skattaváttanin, ið upplýsti aldurin á móttakaranum, ikki kann krevjast longur, kunnu tryggja sær, at persónur uppfyllir kravið um at vera fyltur 20 ár, jbr. § 2, stk. 3 í rúsdrekkalógini, verður við hesum sagt frá, at tollstovan og postverkið, tá talan er um óskamtað rúsdrekka, skulu krevja skjalprógv fyri aldur móttakarans, har hetta verður mett at vera neyðugt, men ikki tá rúsdrekkaskamtanarkort skal nýtast, tí føðingardagurin stendur á kortinum.

L.v.

Føroya Tollstova
100 Tórshavn

HIN FØROYSKI FÓLKAFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 45/1988: Løgtingslóg um dupultsporað berghol í millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um dupultsporað berghol í millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli.	lagtingslov om dobbeltbanede tunneller mellem Ánirnar, Árnafjørð og Depli.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at skipa fyri gerð av dupultsporaðum berghólum í millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til at lade udføre dobbeltbane tunnel imellem Ánirnar, Árnafjørð og Depli.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Fyri 1½ ári síðani legði Fólkaflokkurin fram uppskot um dupultsporað berghol eystur um fjall á Borðoy (tingmál nr. 96/1986).

Í viðmerkingunum til tað málið vístu vit á, at ferðslan er ógvuliga nógt økt, og akførini eru vorðin større hesi 20 árini, síðani núverandi berghol vórðu tikin í nýtslu. Vit hildu, at tíðin nú var komin at fyrireika nýggj berghol, tí vit halda engar møguleikar verða fyri at víðka verandi berghol uttan at steðga ferðsluni heilt, og tað kann als ikki koma upp á tal.

Vit vistu, at tað ganga nøkur ár, frá tí at fyrireikingarnar byrja, til tey nýggju bergholini verða klár at taka í nýtslu, og høvdu vit tí uppskot um, hvussu tann ruðuleikin kundi loysast, sum hvønn dag er inni í bergholinum, tá stórir bilar møtast, ið ikki kunnu halda sínar vikiskyldur.

Hetta var eitt uppskot um ljósregulering. Men okkara uppskot vórðu feld.

Í staðin var eitt uppskot til samtyktar frá meirilutanum í samferðslunevndini samtykt, sum álegði landsverkfrøðinginum at gera tørvskanningar og at útvega uppskot um, hvussu truplu ferðsluviðurskiftini í bergholinum kunnu loysast.

Síðani hoyra vit einki aftur til málið fyrr enn í juni mánaði í ár, tá farið verður undir at víðka møtiplássini inni í eystara vergholinum.

Fyri tað fyrsta halda vit ikki, at hetta arbeiðið, tá tað er liðugt, loysir trupulleikarnar, men arbeiðið inni í bergholinum hevur hinvegin ført við sær, at bergholíni eru vorðin ein deyðsfella. Rennurnar, sum skulu halda vatnínum av koyribreytini, eru tiptar av sprongdum gróti, so alt eystara bergholið er teir beru hyljar.

Arbeitt verður í millum kl. 23 og 06, men kl. 6 á morgni er oftast so tjúkt av spreingigassi og maskinosa, at tað als ikki er framkomandi.

Hetta gassið kann í stillum veðri verða standandi allan dagin.

Sum oftast er uppruddingin av koyribreytini ikki liðug fyrr enn út í móti miðdegi, og har sprongt er, er ongin trygging gjørd undir loftinum. Hyljarnir eru so stórir, at fleiri bilar eru kódnaðir av vatni og har staðið uppsteðgaðir í øllum hurlivasanum.

Úrslitið av hesum er, at tað eru sera nógv fólk, sum dagliga skal brúka hesa farleið til og frá arbeiði, sum ikki tora at koyra ígjøgnum bergholið.

Eisini liggur økið eystan Múla avskorið frá lækna og hjálparveitingum frá Klaksvík, um so skuldi borið á, at brúk var fyri hesum, meðan arbeitt verður í bergholunum.

Í uppskoti okkara (96/1986) vístu vit á, hvussu sleppast kann undan, at tvey stór akfør, sum ikki kunnu halda sína víki-

skyldu, møtast inni í bergholinum.

Vit fara tí at loyva okkum einaferð enn at seta hetta uppskot fram, og samstundis at steðga tí arbeiði, sum er í gongd, beinanvegin.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at steðga arbeiðinum við at víðka vikiplássini í Borðoyarbergholunum, at fáa tey aftur í tann stand, tey vóru í frammanundan, og at skipa fyri tjósregulering fyri akførum, sum ikki kunnu halda sína víkiskyldu.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. september 1988.

Anfinn Kallsberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 45/1988: Løgtingslóg um dupultsporað berghol í millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli.

Málið er lagt fram av Anfinn Kallsberg, løgtingsmanni 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð 2. september 1988 beint í samferðslunevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tryggjar minnilutar.

Minnilutin (Tórálvur Mohr Olsen, Jóhannes Martin Olsen og Adolf V. Hansen) ásannar, at verðandi berghol í Norðoyggjum ikki eru tíðarhóskandi og at tørvur er á, at nakað verður gjørt við spurningin um at hesi verða gjørd so tíðarhóskandi, at tey lúka tey krøv ið ferðslan í dag og framyvir krevur. Tí verður neyðugt at gera kanningar, ið skulu vísa um tað er fíggjarliga og tekniskt grundað at breika og hækka verðandi berghol ella gera nýggj berghol. Nevndi minniluti tekur ikki undir við uppskoti Anfinn Kallsbergs og setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingi áleggur landsstýrinum at seta í verk fíggjarliga og tekniska kanning av berghølsspurninginum í Norðoyggjum.

Minnilutin (Heini O. Heinesen og Asbjørn Joensen) kann ikki taka undir við lógaruppskotinum í tí líki tað er sett fram. tá fólkaflokkurin mælir til at bora Ánirnar, Árnafjørð, Depli; eftir hvat er upplýst er hetta ein loysn ið kostar umleið 150 mió. kr.. Hetta er so mikið stór ein upphædd, at ikki kann væntast, at hetta kann lata seg gera innanfyri ríkiliga tíð. Harafturat kemur, at øll henda upphædd skal brúkast áðrenn nakar bati verður á ruðuleikanum á hesi faroleið. Spurningurin er, um økið har norðuri tolir at bíða so leingi - eini fýra til fimm ár. Loysnin hesin minnilutiskjýtur upp, tekur ikki meira enn tvey ár, tá er Árnafjørður ikki við í fyrstu atløgu. Loysnin fyri Árnafjørð tekur eitt ár at fremja.

Tí fer nevndi minniluti at seta framm sítt egna uppskot til loysn av hesum málið.

Sum flestu tingmenn vita er Kunoyartunnilin um at verða liðugur, og vegurin Grótrætt - Strond er komin á góða leið. Stangarvegurin somuleiðis, so um nakrar mánaðir er einki stórt arbeiði í gerð hjá Landsverkfrøðinginum á hesum økið, so møguleiki skuldi verið fyri hjá komandi Landsstýrissamgongu at fara í holt við eitt berghol eystur um fjall í komandi árið.

Um avgjørt verður at lata arbeiðsplássið í Haraldsundi verða standandi, t.v.s smiðjuna - arbeiðsskúrar og kantinuna. hetta er í høvuðsheitinum teir facilitetir, sum skulu til at reka eina tunnil, so er strekki ikki longri enn so, at tað letur seg væl gera at brúka sama arbeiðspláss til tann nýggja Borðoyartunnulin sum hóskandi kundi byrja líka norðanfyri Svartá og komið útaftir á Depilsheyg - hesin tunnil verður umleið 3000 metur og kostar 80 mió. kr.

Fyrimunurin við einum slíkum projekti er eygsýnligur, so gott sum ongin vegagerð er neyðug. Arbeiðsplássi standur klárt og ein partur av grótinum kundi verið brúktur í samband við siglingarrennuna í Haraldsundi: Hetta komst av, at byrgingin skal liftast upp, so siglandi verður undir. Sum støðan er í dag er stórur tørvur uppá grót í løtuni, so her kunnu nakrar milliónir sparast við at bora tunnil, í staðin

fyri at spreingja fúl sár í náttúruna.

Minnilutin setir út frá omanfyristandandi viðmerkingum fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingi áleggur landsstýrinum (Landsverkfrøðinginum) at kanna hvussu nógv tíð sparast kann við at brúka sama arbeiðsplass sum brúkt varð til Kunoyartunnlina og at samansjóa projektí við siglingarrennuna í Haraldsundi, tá ein ávis nøgd av gróti skal brúkast í hesum samband.

Í øðrum lagi tekur nevndi minniluti undir við minniluttauppskotinum hjá Tórálvi Mohr Olsen, Jóhannes Martin Olsen og Adolf V. Hansen.

Minnilutin (Eyðun Videro og Svend Aage Ellefsen) førir fram, at tað er avgjørt neyðugt uttan óneyðugt dráil at tryggja ferðsluna eystur um fjall á Borðoyvið at lata gera nýggj dupultsporað berghol, soleiðis sum skotið er upp.

Sum ávíst í viðmerkingunum eru hesi berghol gjørd í eini tíð, hvar tørvurin ikki var so stórur fyri størri ferðslu, men at tíðin er komin til at hetta øki má fáa hóskandi ferðsluumøguleikar, sum tíðin krevur. Hetta gerst ikki við at víðka verandi møtipláss inni í tunnlunum, tí hesi berghol klára kortini ikki at taka ímóti teimum stóru akferunum, ið nýtt verða í dag.

Tá vit ásanna, at víðkan av møtiplássunum bøtir um støðuna, men at arbeiðið sum fer fram í løtuni bert er til ampa fyri ferðsluna so valja vit mæla til, at arbeiðið verður steðgað, og at fyrireikingar samstundis fara í gongd til at bora nýggj berghol soleiðis sum skotið er upp.

Vit undirstrika, at neyðugt er at gera hesi berghol soleiðis at Árnafjørður kemur við í høvuðsferðsluæðrina, og

ikki sum nevnt hevur verið at leggja tunnilin norðari fyri at stytta um hann, t.v.s. at tunnilin verður lagdur uttan um Árnafjørð.

Minnilutin vil tí mæla løgtinginum til at samtykkja lógaruppskotið um dupultsporað berghol millum Ánirnar, Árnafjørð og Depil, og somuleiðis uppskotið til samtyktar um at steðga viðkanina av vikiplássinum í verandi tunnlum, og at gera ljósreguleringar við tunnilsmunnarnar.

Tá arbeiðini í tunnlunum steðga, so verður boriútgerðin tøk, ið kann nýtast aðrastani.

Tann 5. mars 1987 legði Svend Aage Ellefsen vegna Fólkaflokkin fram uppskot til samtyktar (løgtings mál nr. 97/1986) viðvíkjandi bergholi til Gásadals.

Í áliti frá Samferðslunevndini dagfest 8. apríl 1987 vísir meirilutin (samgonguflokkarnir) á, at sambært teirri ætlan, samgongan hevur lagt viðvíkjandi bergholsgerð, verður farið undir berholið til Gásadals á vári 1988, og uppskotið frá Fólkaflokkinum verð feit í løgtinginum.

Nú er árið 1988 rættuliga langt komið, so tað sær ikki út til, at samgongan hevur í hyggju at fremja hesa tunnilsgerð, men í treysti til, at ein meiriluti finnst í løgtinginum fyri at fremja hetta fyri Gásadalsfólk lívsneyðuga ferðasamband setir minnilutin fram hetta

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at flyta tunnilsboriútgerðina úr Norðoyggjum til Vágoynna og byrja tunnilsgerðina til Gásadals beinanvegin

SAMFERÐSLUNEVNDIN, 6. september 1988.

Tórálvur Mohr Olsen Asbjørn Joensen Adolf V. Hansen

Heini C. Heinesen Eyðun Viderø Svend Aage Ellefsen

Johannes Martin Olsen

Broytingaruppskot

1

Løgtingsmál nr. 45/1988: Løgtingslóg um dupultsporað berghol í millum Árnafjarðar og Depli.

Vísandi til tá óhepnu mannagongd, ið nýtt hevur verið gjøgnum nógv ár, har bergholsætlanir knappliga stinga seg upp, serliga frammanundan løgtingsvalum, verður við hesum skotið upp, at nýhugsan innan samferðsluútbyggingar vinnur frama.

Fyri at nærkast einum rímuligari fløgubýti innanfyri samferðsuíløgur kann verða víst til fyrispurning 100-6/1987, sum var soljóðandi:

"Kann landsstýrið í hesi tingsetu skipa fyri eini løgtingsviðgerð av samferðsluviðurskiftunum og -útbyggingum í Føroyum við serliga atliti til eina tíðarfesting av fløgum grundaðum á upplýsandi tilfari av sundurgreinaðum verkætlanum og kostnaðinum av hesum?"

Hesin fyrispurningur varð tíanverri ikki svaraður, og misti verandi løgting møguleikan fyri einum grundleggjandi tjaki um samferðsluíløgur yvirhøvur á gólvið.

Í hesum máli er uppskot um tvíbreytað berghol í Norðoyum. Í Suðuroynni eru verandi vegir og berghol millum tey vánaligastu í landinum og verður tí soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um tvíbreytað berghol millum Hov og Tjaldavík.	Lagtingslov om dobbeltbane tunnel mellem Hov og Tjaldavik.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at skipa fyri gerð	§ 1. Landsstyret bemyndiges til at lade udføre dobbelt-

av tvíbreytaðum bergnoti millum Hov og Tjaldavík.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

bane tunnell imellem Hov og Tjaldavík.

§ 2 Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Harafturat verður sett soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta í verk fíggjarliga og tekniska kanning av bergholsspurninginum í Suðuroy við atliti til Hov-Tjaldavík, Famjin-Øravík, Tvøroyri-Hvalba og Hvalba-Sandvík.

Á FØROYA LØGTINGI 6. september 1988

Hergeir Nielsen

Óli Breckmann,
Løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 46/1988: Avlamnis-, lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll.

u p p s k o t

til

Løgtingslóg um avlamnis-, lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll.	forslag til lagtingslov om invalide-, livs- og pensionsforsikring med skattefradrag for alle.
§ 1. Allir føroyingar í vinnu hava skyldu at vera undir avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging.	§ 1. Alle færinger i erhversarbejde er forpligtet til at tegne invaliditets-, livs- og pensionsforsikring.
§ 2. Avvarandi hjá tryggjaðum koma somuleiðis undir trygging.	§ 2. Den forsikredes pårørende omfattes af forsikringen.
§ 3. Limir í yrkisfeløgum kunnu tekna samlagstrygging, einstaklingar sína egnu trygging og í báðum førum ta trygging, ið tryggingartakarar í felag/ einsæris halda hóska best til tørvin	§ 3. Medlemmer i fagforeninger hann tegne gruppeforsikringer, enkeltpersoner deres egen forsikring og i begge tilfælde den forsikring som de/den sikrede hver for sig skønner, passer bedst til behovet.

§ 4. Yrkisfeløg hava skyldu mótvegis limunum. at tey ery tryggjað

§ 5. Allar tryggingar skulu umfata:
a) útgjalding við deyð áðrenn fylta 67 ár, (60 ár), antin undir einum ella leypandi útgjalding árliga /mánaðarliga ella samanseting av báðum.
b) útgjalding við avlamni, (2/3 av lønini ella meir) áðrenn fylta 67 ár (60 ár), antin undir einum ella leypandi, sum tørvurin er,
c) útgjaldingin millum fylta 60 og 67 ár, (undir einum, leypandi ella bæði).

§ 6. Aðrar tryggingar, sum fólk í felag ella einsæris hava teknað, verða ikki ávirkaðar av hesi lóg og hava framvegis gildi.

§ 7. Fólka- og avlamispensiónskipanin verður ikki ávirkað av hesi lóg, heldur ikki útgoldnu upphæddirnar.

§ 4. Fagforeninger er forpligtet til at forsikre deres medlemmer.

§ 5. Alle forsikringer skal omfatte:
a) udbetalingen ved død før det fyldte 67 år (60 år) enten een samlet udbetaling eller løbende udbetaling årligt/månedligt eller en kombination heraf,
b) udbetaling ved invaliditet, (2/3 af lønnen eller mere) før det fyldte 67 år (60 år) enten een samlet udbetaling eller løbende efter behov,
c) udbetalingen mellem det fyldte 60 og 67 år (i een udbetaling løbende elle en kombination heraf).

§ 6. Andre forsikringer, som personer i fællesskab eller individuelt har tegnet, berøres ikke af denne lov og har fortsat gyldighed.

§ 7. Folke- og pensionsordningen berøres ikke af denne lov, heller ikke udbetalte beløb.

§ 8. Tá henda lóg er samtykt. fer løgtingslóg um "samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønarg runn" úr gildi.

§ 8. Når denne lov er vedtaget, træder lagtingslov om "solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond"

§ 9 Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 9. Denne lov træder i kraft straks.

§ 10. Inngoldna tryggingargjaldið hevur frádráttarrætt frá skattskyldugu inntøkuni hjá tryggingartakaranum við upp til kr. 10.000.

§ 10. Indbetalte forsikringspræmier kann fradrages i forsikringstagerens skattepligtige indkomst med op til kr. 10.000.

Viðmerkingar:

Tann lívs-, avlamis- og eftirlønarskipan, sum skotin er upp her, hevur fleiri fyrimunir fram um verandi skipanir og lógir.

Fólkapensiónin er ov lág longu nú, og við verandi vøkstri í talinum á eldri fólki í mun til lutfalsliga minkandi talið á vinnuførum fólki linkar orkan hjá samfelagnum at bera fíggjarligu byrðarnar av fólkapensiónini í framtíðini. Tí má aldurdómurin hjá fólki tryggjast í størra mun enn higatil.

Avlamispensiónin er hvørki til at liva ella doyggja av, og samfelagssins orka at bera hægri avlamispensión má tí styrkjast. Tað ger hetta uppskot í stóran mun.

Vanlukkutryggingin rækkur hvørki til lítið ella stórt, og tí er rætt at lógartryggja rættin hjá fólki, ið doyggja av vanlukku ella koma sær til skaða, og avvarandi teirra at eiga eina trygd, sum henda lógin veitir.

Henda uppskotna samtrygging hevur fleiri fyrimunir við sær: Í fyrsta lagi ávirkar hon ikki og er óávirkað av verandi pensiónskipanum, undantikið "samhaldsfasta arbeiðsmarkanaðareftirlønargrunnin", sum fellu burtur, um hetta uppskot verður samtykt.

Henda samtryggingin hevur hesar fyrimunir fram um ta "samhaldsføstu":

1. Hon er ein lívstrygging við stórari útgjalding við deyð í ótíð.
2. Hon er avlamistrygging við stórari útgjalding við avlamni.
3. Hon verður lagað eftir tørvi hins einstakra ella yrkisfelags og munar tí betur.
4. Hon sleppur tryggingartakarum lættari í skatti, meðan hin "samhaldsfasta" herðir skattatrýsti 4% upp um skattahámarkið.
5. Hon virkar skjótari og munabetri enn hin "samhaldsfasta", sum eingin nytta er í fyrr enn mitt í 90-árunum og tá bert ein viðfáningur.
6. Hon tálmar almennu nýtsluna, meðan hin økir hesa nýtslu.
7. Hon økir uppsparingina í samfelagnum og gagnar harvið tí einstaka og vinnulívinum.
8. hon ber í sær valfrælsi fyri tryggingartakran eftir ynski og tørvi eisini sum umstøður broytast, meðan hin "samhaldsfasta" er tung og virkar tyngjandi eins fyri øll.

Henda uppskotna samtryggingin virkar eisini fyri avvarandi hjá tryggingartakaranum, heimaarbeiðandi húsmóðrini, einkjuni og einkjumannininum, serliga tá óvæntað deyðsfall rakar familjufólk millum 20 og 67 ára aldur (eini 80-90 hvørt einasta ár).

Eini 7.000 einstaklingar í Føroyum (av 17.000 í løntari vinnu) hava longu teknað trygging einsæris ella samlagstrygging gjøgnum yrkisfelag. Fleiri modell eru tøk, og landsstýrið er væl kunnað við ymsar møguleikar frá teimum samráðingum, ið verið hava um eftirlønar-, lívs- og avlamistryggingar við yrkisfeløg, ið hava lønar- og starvssáttmálar við hitt almenna, t.d. Starvsmanna-, Post-, Teknikara-, Maskinmeistara-, Løgfrøðinga-, Magistara-, Lærara-, Sjúkrasystra- o.m.o. yrkisfeløg, sum øll eru ovurfegin um sínar skipanir. Havnar Arbeiðsmannafelag hevur fingið frálíka samlagstrygging, og Handverkarafelagið ætlar tað sama.

Føroya Lívstrygging kann umsita eina slíka samtrygging fyri øll í landinum, og Tryggingarstovan við Kjartan Dalsgaard er altíð til reiðar at vegleiða løgtingsnevndina, ið fær málið til viðgerðar, við fakligum upplýsingum.

Ætlandi kostar ein alfevnandi samtrygging sum henda uppskotna millum 5 og 9 % av árslønini hjá tryggingartakarum. Men henda peningahædd, t.d. upp til 10.000 kr. eigur at kunna dragast frá í skattinum, sum kostar landskassanum nakrar fáar tíggju mill. kr. í inntøku árliga í fyrstani.

Uppsparingin í samfelagnum hevði økst 100 mill. kr. árliga við teim 10.000 nýteknaðu tryggingartakarunum.

Fyrimunurin við slíkari samtrygging fram um ein naknan og eintáttaðan eftirlønargrunn sum hin "samhaldsfasta" og fram um vanliga kapitalpensión, er at útgoldna tryggingarhæddin altíð verður dagførd við lønarlagið, samstundis sum hon fremur trygga og støguða prís- og lønargongd í samfelagnum yvir longri áramál.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988.

Óli Breckmanna

Á l í t

Løgtingsmáli nr. 46/1988: Avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádráttí fyri oil.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hilmar Kass, Agnar Nielsen og Heini O. Heinesen) ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur í prinsippinum undir við fyriliggjandi lógaruppskoti, men er av teirri áskoðan, at hetta eigur at vera viðgjørt av løgtinginum aftan á at løgtingsval er farið fram í heyst.

SKATTANEVNDIN, 6. september 1988.

Sverre Midjord | Jógvan Sundstein | Hilmar Kass

Agnar Nielsen | Heini O. Heinesen

Óli Breckmann
løgtingsmaður

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 47/1988: Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um demokratisering av sjónvarpsmonopolinum.

§ 1. Løgtingið velur 9-manna nevnd av sakkønum at kanna og skriva álit um verkætlan til at demokratisera útvarps/sjónvarpsmonopolið.

§ 2. Álit nevndarinnar verður tøkt so skjótt, at landsstýrið kann leggja lógaruppskot fyri tingið í tráð við hesa lóg og eftir tilráðing nevndarinnar á ólavsøku komandi.

§ 3. Nevndin verður mannað, so hon umboðar sakkunnleika um fjølmiðlar, teknisk og innihaldsligа, mentan,

Lagtingslov om demokratisering af tv-monopolet.

§ 1. Lagtinget vælger et udvalg på 9 medlemmer af sagkyndige at undersøge og skrive en betænkning om et program til demokratisering af radio/tv-monopolet.

§ 2. Udvalgets betænkning skal foreligge så betids, at landsstyret kan lægge lovforslag for tinget i overensstemmelse med denne lov i henhold til udvalgets indstilling kommende olaj.

§ 3. Udvalget sammensættes således, at det repræsenterer sagkyndige for massemedierne teknisk og ved sin

trúarlív, búskap og løgfrøði, og verður vald eftir vanligum løgtingslutfalsvali.

§ 4. Arbeiðssetningur nevndarinnar er at finna fram til bestu og bíligastu útvarps- og sjónvarpsskipan, ið eftir entreprisumodellinum við einum sendineti sum nú, og við einum øðrum óhettum SV-2 sendineti og útvarpsræsum, og fragastu fíggjarloysn í báðum førum, eisini møguliga lýsingarinntøkum.

§ 5. Sjónvarpsgrunnurin ber útreiðslurnar, upp til 250.000 kr., ið standast av nevndararbeiðinum.

§ 6. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

sammensætning iøvrigt, kultur, religion, økonomi og jura. Udvalget vælges efter lagtingets regler om forholdstalvalg.

§ 4. Udvalgets kommisorium er at finde frem til den bedste og billigste radio- og tv-ordning som efter et entreprisemodel med et sendenet som nu, og med et andet uafhængigt tv-2 sendenet og radiokanaler og med den bedste økonomiske løsning i begge tilfælde også med mulige reklameindtægter.

§ 5. TV-fondet afholder udgifterne indtil 250.000 kr. til udvalgsarbejdet.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Framleiðsluorkan og -háttur hjá SVF eru avmarkað, og maktar stovnurin ikki at kappast í undirhaldi við sjónbandaídnaðin longu nú. Hvaðna verri verður, tá tað longu í ár ber til at taka tónleika-, films-, ítróttar-, undirhalds- og útlendskar tíðindasendingar niður frá 6 satelittum. Fylgisveinarnir fjølgast í stórum komandi árini.

SVF arbeiðir undir trongum korum og við lítlari manning, men hevur gott sendinet og sendaraútgerð at ráða yvir. Hesum okkara nýggja tíðindamonopoli gongst rættiliga væl at gera før-

eyskar tíðindasendingar og so tær breiðaru og djúparu sendingarnar um aktuell ella áhugaverd føroysk evni.

Eyðvitað er, at uttan mun til, hvussu nógv stovnurin verður útbygdur í verandi líki sum monopol, dragna vit sim frá líður longur og longur afturút á hesum týðandi upplýsingarøki.

Í grannalondum okkara víðka tey útboðið av landsumfatandi og lokalum senditilfari við at gera tað møguligt hjá fleiri áhugabólkum, feløgum og samtøkum av einstaklingum at framleiða og sjónvarpa egið upplýsingartilfar. Sumstaðni verður hetta gjørt við sonevndum SV-2, ið eru sjálvstøðug sendinet óheft av statsmonopolinum. Aðrastaðni royna tey at brúka tíðindamonopolið sum varpara av sendingum, sum onnur feløg enn starvsfólkini á almenna SV-monopolinum framleiða.

Um tíðindaflutningur og upplýsing í Føroyum skuldu lokið vanlig demokratisk krøv um pressufrælsi, átti bert tekniskar forðingar at darva fríari upplýsing, og eingin monopollóggáva at vart einstakan stovn við framihjárætti, meðan øll onnur einki pressufrælsi hava orsakað av skerjingum á hesi náttúrligt ófjøltrøðu virkisøkir einum fríum landi.

Men sum ikki einaferð hevur tøknifrøðin í fría vesturheiminum gjørt henda pressueinkarrætt ótíðarhóskandi. Hesi sannroynd ber til at laga seg eftir við hesum lógaruppskoti sum fríger SV-framleiðslurættin.

Eitt føroyskt SV-2 krevur nýggja sendaraútgerð á fjøllunum fyri millum 5-10 mió. kr.

Men ein loyvisskipan innan karmarnar hjá SVF, sum byggir á entreprisumodellið, kann fáast í lag uttan eykakostnað í útgerð.

Tað eigur sostatt at vera loyvt feløgum, sum eru stovnað bert við framleiðslu av SV-sendingum fyri eyga, at leiga sær fastar tíðir, nakrar tímar um mánaðin, inn á sendinetið hjá SVF við egnum sendingum. Á henda hátt kundu lokalu sjónvarpsfeløgini, sum enn eiga útbúnað, fæ og serkønt fólk, sent nakrar tíma í alt hvørja viku.

Tey SV-studiir, sum eru í landinum, men sum ikki hava havt loyvi til at nýta kunnleika og útgerð almennt, kundu verið við til at framleiða eftir umbøn, sáttmála ella leysari avtalu.

Hvør senditími hjá SVF kostar sum er um 5.000 kr.

Umroknað til føroyskar og føroyskaðar sendingar kostar hvør tími um 10.000 kr., meðan hvør føroyskt framleiddur senditími kostar 20.000 kr.

Sostatt eru útreiðslurnar til føroyskt senditilfar stórar sum er, og hevði ein loyvisskipan eftir entreprisumodellinum neyvan kostað meira um tíman enn hin verandi.

Annars eigur nevndin at kanna møguleikan fyri lýsingarinntøkum, SVF ella eitt av tí óhefta studioverkstað kundi tikið upp á seg at framleiða lýsingar til at fíggja sendingar við, ella kundi hvør einstakur loyvishavari av senditíð útvegað sær egnar lýsingarinntøkur, tó so at lýsingar bert fáa innivist í blokkum ávist minuttal fyri hvønn senditíma.

Lond, sum hava roynt skipan við lýsingarfígging av sjónvarpi, kunnu prógva, at sjónvarpslýsingarnar ikki koma upp um 20% av samlaða lýsingarumsetninginum í landinum, bert brotpartur av tí, ið avísir og serliga fakbløð lýsa fyri.

Umframt at lata loyvishavarum studio og sendinet, kann SVF framleiða egnar tíðindasendingar eins og nú so ofta um vikuna, sum myndugleikar, nevnd og leiðsla halda vera rímuligt, kanska sum nú upp í fjórðing av samlaðu senditíðini.

Sjónvarpsnevndin eigur at hava sum uppgávu at viðgera umsóknir um sendiloyvi, ið kann veitast feløgum t.d. upp til 3 ár. Sendiloyvi, ið ikki verður brúkt, ið verður misnýtt ímóti vanligari pressulóg, kann takast frá loyvishavara. Sendingar eiga at lúka vanlig krøv eftir pressulógini, og framleiðarin eigur at goyma hvørja sending í ávist tíðarskeið, eftir at hon er send.

Í almennum gildi kann skoytast uppí, at tað í dag er dýrari at útvega fullfíggjaða framleiðsluútferð til eina avís enn til eitt sjónarpsverkstað. Postverkið tryggjar útbering av føroysku bløðunum. Telefonverkið kundi hóskandi tikið uppa á seg tekniskt og fíggjarliga at tryggja sendinetið til framtíðar føroyskt sjónvarp eftir entreprisuskipanini.

Tekniskt liggur leiðin víðopin fyri, at stórar skapandi kreftir verða loystar í føroyska samfelagnum til framleiðslu av sjónvarpssendingum. Grundreglan eigur at vera, at bert tekniskar

avmarkingar forða fyri, at hesar skapandi kreftir sleppa at virka frítt, og er núverandi darvandi einkarrættur í stríð við grundlóg og viðurkendan mannarætt.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. September 1988.

Óli Breckmann

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 47/1988: Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum.

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 2. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint til viðgerðar í skúla- og mentamálanevndini.

Endamálið við uppskotinum er við lóg at áleggja landsstýrinum at velja nevnd til tess at skipa fyri einum øðrvísi bygnaði av Sjónvarpi Føroya - einum bygnaði, ið avtekur einkarrætt Sjónvarps Føroya at senda sjónvarpssendingar. Eisini verður skotið upp at játta 250.000 kr. til hetta arbeiðið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) ásannar, at Sjónvarp Føroya eigur at fáa munandi betri arbeiðsumstøður. Meirilutin heldur ikki uppskot Óla Breckmanns bøta um viðurskiftini hjá Sjónvarpi Føroya, ið er tað mest átrokandi í løtuni. Meirilutin vísir á, at landstýrið arbeiðir við at gera ábøtur á húsaviðurskiftini hjá sjónvarpinum, eins og landsstýrið arbeiðir við bygnaðinum í Sjónvarpi Føroya. Meirilutin heldur tí onga orsøk vera at samtykkja uppskotið frá Óla Breckmann og setir tí einki uppskot fram í tingmálinum.

Ein minniluti (Óli Breckmann) mælir til at samtykkja uppskotið óbroytt.

Ein annar minniluti (Eilif Samuelsen) tekur í høvuðsheitinum undir við uppskotinum um at avmonopolisera sjónvarpið og at sett verður ein nevnd, sum skal arbeiða við m.ø. at decentralisera framleiðsluna av sjónvarpsprogrammum.

Vart verður gjørt við, at torført fer at vera at velja nevndina eftir teimum sjónarmiðum, ið nevnd eru í § 3.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 5. september 1988.

Jóannes Dalsgaard Hergeir Nielsen Asbjørn Joensen

Eilif Samuelsen Óli Breckmann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 48/1988: Broyting í vallógini. (149/1987)

Málið varð lagt fram í eykatingsetuni 1987, og varð uppskot til samtyktar um, at rættarnevndin skuldi arbeiða víðari við málinum sum millumtinganevnd og leggja álit fram í ólavsøkutingsetuni samtykt við 17-0 atkvøðum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ingrið Sondum, Jóannes Dalsgaard, Eilif Samuelsen og Jákup Lindenskov) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykja tað.

RÆTTARNEVNDIN, 5. september 1988.

Ingrið Sondum Jóannes Dalsgaard Jákup Lindenskov

Jógvan Sundstein Eilif Samuelsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn 31. august 1988

Tlf. 11080 . Telex 81135 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Kontorskriftið: Kl. 10—15, laugardag stongt

F. L. j. nr. 403-6-31-1-3
(at tilskilja á svari)

RJ/IM

Føroya Løgting.

Løtingsmál nr. 49/1988: Løtingslóg um broyting í løtingslóg um serligt innflutningsgjald.

U p p s k o t

til

Løtingslóg um broyting í løtingslóg um serligt innflutningsgjald.

§ 1.

Í løtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, 2. stk. nr. 19 fellur burtur og í staðin verður § 2, 2. stk., nr. 20 broytt til nr. 19 og § 2, 2. stk. pkt. 21 broytt til nr. 20.
2) Sum nýggj § 2a verður sett: Landsstýrið ásetir við kunngerð, at ymiskt byggitilfar:

lagtingslov om ændring af lagtingslov om særlig indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 fra 27. april 1961 om særlig indførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 2, 2. stk. nr. 19 udgår og i § 2, stk. 2. pkt. 20 ændres til pkt 19 og § 2, stk. 2, pkt. 21 ændres til pkt. 20.
2) Som ny § 2a indsættes: Landsstyret fastsætter i henhold til bekendtgørelse at diverse byggematerialer:

cement, ótilgjørt timbur, krossfiner, byggiplátur, gipsplátur, masonitplátur, laminatplátur, stein- og glasull og glastrevja, plastrávørur, taksteinar, tjørupapp, tak- og klædningsplátur, planglas í talvum, ótilgjørt jarn og stál (plátur, bjálkar og profilar), ótilgjørt aluminium (plátur, bjálkar og profilar) eru undantiknar frá innflutningsgjaldinum eftir hesari lóg.

2. stk. Landsstýrið ásetir við kunngerð nærri reglur fyri hvørji krøv, ið skulu lúkast, sum treyt fyri fritøku fyri innflutningsgjaldið sambært 1. stk.

§ 2.

Sum nýggj § 2b verður sett:

Grundarlagið fyri tarifering eftir hesi lóg er vøruskráin fyri inn- og útflutning sett upp grundað á nomenklatur tollsamvinnuráðsins "Harmonized Comodity Description and Coding System" (HS) og tær í vøru-

cement, ubearbejdet træ, krydsfiner, byggeplader, gipsplader, masonitplader, laminatplader, sten- og glasuld og glasfibre, plastråvarer, tagsten, tjærepap, tag og beklædningsplader, planglas i tavler, ubearbejdet jern og stål (plader, bjælker og profiler), ubearbejdet aluminium (plader, bjælker og profiler) er undtaget for indførselsudgifter efter denne lov.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter i henhold til bekendtgørelse nærmere regler for hvilke krav, der skal være opfyldt som betingelse for undtagelse for indførselsafgiften jfr. stk. 1.

§ 2.

Som ny § 2b indsættes:

Grundlaget for tarifering efter denne lov er varefortegnelsen for indførsel og udførsel opstillet på grundlag af toldsamarbejdsrådets nomenklatur "Harmonize System Comodity Description and Coding System" (HS) og de i vare-

skránni vanligu tariferingsreglur viðvíkjandi "Harmonized System".
2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur um nýtslu av vøruskránni í samband við fyrisitingina av hesari lóg.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

fortegnelsen indeholdte almindelige tariferingsbestemmelser vedrørende det harmoniserede system.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for anvendelse af varefortegnelsen i forbindelse med administrationen af denne lov.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar.

Tann 6. mai 1988 samtykti Føroya Løgting broyting í lóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald.

Ein av hesum broytingum var § 2, 2. stk., nr. 19, har ymiskt byggitilfar var undantikið frá 22% gjaldinum. Í viðmerkingum til hetta lógaruppskot varð fört fram, at tær vørur, ið hugsað var um, var ymiskt byggitilfar, ið hevði ávísar skrásetingar í vøruskránni.

Tað vísir seg, eftir at lógin er viðtikin, at tað er sera trupult hjá tollvaldinum og landsstýrinum at fyrisita hesa broyting, tí tað er ivasamt hvørjar upplýsingar, ið kunnu krevjast av innflytarunum, sum grundgeving fyri at sleppa

undan at rinda 22% gjaldið, eftirsum einki er fört fram í lógini um hetta. Harumframt er tað ivasamt, um landsstýrið kann áseta nærri reglur um, hvørjar ávisar skrásetingar í vøruskránni eru undantiknar frá serliga innflutningsgjaldinum, av tí at tað bert er fört fram í viðmerkingunum (og ikki í lógini), hvør heimild landsstýrisins er.

Tí er tað rættast, um landsstýrið fær heimild í lógini til í kunngerð at seta nærri reglur fyri hesum.

Ein onnur broyting, ið er framd, er, at vøruskráin, ið er grundað á alheims vøruskránna (HS), verður løgd til grund fyri tarifering sum heild.

Ein triðja broyting, ið sýnist náttúrlig eftir at Føroya Tollstova er farin at virka, er, at tað av lógini framgongur, at hetta økið verður fyrisitið av Føroya Tollstovu.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/
/ Jálgrim Hilduberg

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 49/1988: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 6. september 1988 og eftir 1. viðgerð 7. september beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tá talan er um neyðugar rættingar ella justeringar í galdandi tollløggávu.

SKATTANEVNDIN, 7. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 31. august 1988

F. L. j. nr. 403-6-31-1-1
(at tiskkja í svari)

Tlf. 11080. Telex 81235 tinpm fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardag stongt

RJ/IM

Føroya Løgting.

Løtingsmál nr. 50/1988: Løtingslóg um broyting í løtingslóg um innflutningsgjald.

U p p s k o t

til

Løtingslóg um broyting í løtingslóg um innflutningsgjald.

§ 1.

Í løtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjald v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, 2. stk. verður strikað.
2) Aftaná § 1, pkt. 28 verður sett § 1a, ið verður orðað soleiðis: Grundarlagið fyri tarifering eftir hesi lóg er vøruskráin fyri inn- og útflutning sett upp grundað á nomenklatur tollsamvinnuráðsins

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 fra 11. februar 1950 om indførselsafgift m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1. stk. 2 udgår.
2) Efter § 1, pkt. 28 indsættes § 1a, der affattes således: Grundlaget for tarifering efter denne lov er varefortegnelsen for indførsel og udførsel opstillet på grundlag af toldsamarbejdsrådets nomenklatur "Harmonized

"Harmonized Comodity Description and Coding System (HS) og tær í vøruskránni vanligu tariferingsreglur viðvíkjandi "Harmonized System".

2. stk. Landsstýrinum er heimilað at seta tariferingsnevnd við umboð frá vinnulívinum og fyriseta gjøllari reglur fyri virki hennara.

3. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur um nýtslu av vøruskránni í sambandi við fyrisitingina av hesari lóg.

Commodity Description and Coding System" (HS) og de i varefortegnelsen indeholdte almindelige tariferingsbestemmelser vedrørende det harmoniserede system.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et tariferingsudvalg med repræsentation fra erhvervslivet samt at fastsætte de nærmere bestemmelser for dets virksomhed.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for anvendelse af varefortegnelsen i forbindelse med administrationen af denne lov.

§ 2.

Í teimum greinum har "Føroya Gjaldstova" er nevnd, verður í staðin sett: "Føroya Tollstova".

§ 2.

I de bestemmelser hvor "Føroya Gjaldstova" er nævnt, indsættes i stedet: "Føroya Tollstova".

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar.

Broytingarnar í hesum lógaruppskoti eru gjørdar fyri at fáa samsvar við broytingaruppskotið til lóg um serligt innflutningsgjald.

Ein onnur broyting í hesari lóg, ið sýnist natúrlig eftir at Føroya Tollstova er farin at virka, er, at tað av lógini framgongur, at hetta økið verður fyrisitið av Føroya Tollstovu.

Jógvan Purkhús
landsstýrismaður

/

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 50/1988: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald .

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 6. september 1988 og eftir 1. viðgerð 7. september beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tá talan er um neyðugar rættingar ella justeringar í galdandi tollióggávu.

SKATTANEVNDIN, 7. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Reinesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn

TIf. 11080 . Telex 81235 lingas fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

31. august 1988

F. L. j. nr. 403-6-31-1-2
(at tilskila í svarið)

RJ/IM

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 51/1988: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evka innflutningsgjald.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evka innflutningsgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 um eyka innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:
Aftaná § 2 verður sett § 2a, ið verður orðað soleiðis:

Grundarlagið fyri tarifering eftir hesi lóg er vøruskráin fyri inn- og útflutning sett upp grundað á nomenklatur tollsamvinnuráðsins

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om ekstra indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 fra 17. maj 1979 om ekstra indførselsafgift foretages følgende ændringer:
Efter § 2 indsættes § 2a, som affattes således:

Grundlaget for tarifering efter denne lov er varefortegnelsen for indførsel og udførsel opstillet på grundlag af toldsamarbejdsrådets nomenklatur "Harmonized

"Harmonized Comodity Description and Coding System (HS) og tær í vøruskránni vanligu tariferingsreglur viðvíkjandi "Harmonized System".

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur um nýtslu av vøruskránni í samband við fyrisitingina av hesari lóg.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

Commodity Description and Coding System" (HS) og de i vareforteqnelsen indeholdte almindelige tariferingsbestemmelser vedrørende det harmoniserede system.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for anvendelse af vareforteqnelsen i forbindelse med administrationen af denne lov.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Broytingarnar í hesum lógaruppskoti eru gjørdar fyri at fáa samsvar við broytingaruppskotið til lóg um serligt innflutningsgjald.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

1

Løgtingsmáli nr. 51/1988: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 6. september 1988 og eftir 1. viðgerð 7. september beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tá talan er um neyðugar rættingar ella justeringar í galdandi tollløggávu.

SKATTANEVNDIN, 7. september 1988.

Sverre Midjord Jógvan Sundstein Hilmar Kass

Agnar Nielsen Heini O. Heinesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11030. Telex 85235 finans fa. Telefon 14942. Postbox 64
Viðtalstímar kl. 10—15, leygardaga stongt

6. september 1988

F. L. J. nr.
21 miskala | 19 APR

JH/or

Føroya Løgting.

Løtingsmál nr. 52/1988: Keyp av skrivstovubygningi til Almannastovuna.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um keyp av skrivstovubygningi til landsfyrisitingina.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa skrivstovubygningin hjá P/F Grannskoðaravirkinum í R. C. Effersøesgøtu 26, Tórshavn, fyri 7 mió. kr. og taka upp lán til keypið.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om køb af kontorbygning til landsadministrationen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe kontorbygningen R. C. Effersøesgøta 26, Torshavn, fra P/F Grannskoðaravirkið, Tórshavn, for 7 mio. kr. og til at optage lån til købet.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Almannastovan hevur leingi havt tørv á skrivstovuhølum.

Her umrøddu hús kunnu rúma 20 skrivstovufólkum og lúka tørvin hjá Almannastovuni í lotuni til skrivstovuhúslir.

Húsini eru 450 m^2 til støddar við 3 innrættaðum hæddum, sum allar eru í góðum standi. Grundøkið er 518 m^2 har ein partur er P-pláss til 6-7 bilar. Tað er kanska møguleiki at gera P-pláss omaná ein part av kjallaranum.

Í bygninginum er:

Kjallarahædd:
- 1 skrivstova
- 1 fundarhøli
- 1 rúm til fotoavrit
- 3 goymslurúm
- 1 matarhøll
- inngongd, WC, fýrrúm.

1. hædd:
- Høvuðsinngongd
- móttøkuhøll
- 5 skrivstovur (pláss til 8-9 fólk)
- WC

2. hædd:
- 7 skrivstovur (pláss til 10-11 fólk)
- WC

Seljarin vil hava 7 mió. kr. fyri ognina, har hann metir grundstykkið til 1 mió. kr. og bygningin til 6 mió. kr., sum gevur ein m^2-prís uppá 13.333 kr.

Karolina Petersen
landsstýrismaður

/
/ Jalarim Hilduberg

Løgtingsmáli nr. 52/1988: Keyp av skrivstovubygningi til Almannastovuna.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 6. september 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minnilutin (Jørgen Thomsen, Adolf V. Hansen, Signar Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Flemming Mikkelsen) førir fram, at fyriliggjandi mál er, sum so ofta fyrr, tá tað snýr seg um almannastovuna, ein neyðloysn. Bygningurin, talan er um, hevur grundareal upp á 150 m², liggur við mest trafikeraða veg í landinum, og tey fáu parkeringarplássini, ið eru til taks, eru hinumegin vegin. Nevndi minniluti heldur, at 7 mió. kr. er alt ov høgur prísur fyri umtalaða bygning. Út frá hesum kann nevndi minniluti ikki taka undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Poul Michelsen) tekur støðu í tingsalinum.

FÍGGJARNEVNDIN, 6. september 1988.

Jørgen Thomsen | Signar Hansen | Adolf V. Hansen

Asbjørn Joensen | Poul Michelsen | Ivan Johannesen

Flemming Mikkelsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 54/1988: Lóg um haruveiðu (115/87).

Málið er lagt fram av landsstýrinum 17. mars 1988 og eftir 1. viðgerð 20. apríl 1988 beint í umhvørvisnevndina.

Við 2. viðgerð 4. mai samtykti løgtingið, at umhvørvisnevndin skuldi vera millumtinganevnd, og at málið skuldi viðgerðast saman við nýggjum uppskoti lóg um fuglaveiðu.

Lógin er ein fylgja av nýggjum uppskoti um fuglaveiðulóg, ið kemur í staðin fyri gomlu veiðulógina, ið eisini fevndi um haruveiðu.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins við hesari broyting:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 2 verður sum nýtt 2. stk. sett: "Haruveiðan má bert fara fram í dagsljósi gerandisdagar, og loyvt er bert at nýta høglbyrsu."	I § 2 indsættes som nyt stk. 2: "Harejagt er alene tilladt i dagslys på hverdage, og tilladt er kun at benytte haglgevær."

UMHVØRVISNEVNDIN, 6. september 1988.

Jóannes Dalsgaard Óssur av Steinum Ingrið Sondum

Jógvan Olsen Anfinn Kallsberg

Á i á t

á

Løgtingsmáli nr. 55/1988: Uppskot um trygging av roykfríum umhvørvi á landsstovnum, strandfaraskipum og aðrar staðir.

Felagið Heilbrigdi hevur vent sær til almenna- og heilsunevndina við umbøn um at veita á landsstýrið til tess at tryggja roykfrítt umhvørvi á almennum stovnum og skipum.

Felagið Heilbrigdi hevur lagt við rundskriv frá heilsuministeriinum í Danmark dagf. 23. mars 1988 viðvikjandi hesum spurningi.

Uppskotið hevur til endamáls at tryggja fólkum, ið ikki roykja, eitt roykfrítt umhvørvi, tá tey eru til arbeiðis, og tá tey ferðast.

Løgtingið hevur í hesum valskeiði samtykt eina tubbakslóg. Hóast hetta heldur felagið Heilbrigdi ikki, at ikki-roykjarar alsamt eru nóg væl vardir við roykfríum umhvørvi.

Almanna- og heilsunevndin ásannar, at vit ikki eru rokkin á mál í hesum spurningi og tekur undir við at heita á landsstýrið um at tryggja borgarum landsins, bæði børnum og vaksnum, roykfrítt umhvørvi, so tey sleppa undan umvegis royking.

Tað er tí ein sand almanna- og heilsunevnd, ið getir soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at senda rundskriv til allar almennar stovnar við áheitan um at tryggja starvsfólki og viðskiftafólki roykfrítt umhvørvi.

ALMANNA- og HEILSUNEVNDIN, 6. september 1988.

Karin Kjølbro Jákup Lindenskov Adolf V. Hansen

Jógvan Sundstein Flemming Mikkelsen

Vetrarting

Ár 1988, týsdagin 22. november kl. 15.00 varð løgtingið sett.

Elsti tingmaður, Jørgen Thomsen, setti fundin sambært § 1 í tingskipani.

Ellisformaðurin bað Signar Hansen og Flemming Mikkelsen vera fyribilsskrivarar.

Ellisformaðurin bað Anfinn Kallsberg, Jógvan I. Olsen og Jógvan Durhuus um at kanna valbrøvini hjá tingmonnum, valdir í Suðurstreymoy, Sandoy og Suðuroy. Síðani bað hann Paula Ellefsen, Henrik Old og Hergeir Nielsen um at kanna valbrøvini hjá tingmonnum, valdir í Norðoyggjum, Eysturoy, Norðstreymoy og Vágoy.

Anfinn Kallsberg, Jógvan I. Olsen og Jógvan Durhuus mælti til at valbrøvini hjá hesum tingmonnum í syðru helt vórðu góðkend:

Atli P. Dam, Tórshavn, jf.,
Henrik Old, Vági, jf.,
Flemming Mikkelsen, Vági, sb.,
Hergeir Nielsen, Vági, tf.,
John Petersen, Skopun, ff.,
Jógvan Adolf Johannessen, Skopun, jf.,
Jógvan Sundstein, Tórshavn, ff.,
Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Poul Michelsen, Tórshavn, ff.,
Jóngerð Purkhús, Velbastað, tf.,
Karin Kjølbro, Argir, tf.,
Pauli Ellefsen, Hoydølum, sb.,
Elif Samuelsen, Tórshavn, sb.,
Marita Petersen, Tórshavn, jf.,
Jákup Lindenskov, Tórshavn, jf.,
Tórbjørn Poulsen, Tórshavn, sj.,
Tordur J. Niclasen, Eiði, krt & fff.

Pauli Ellefsen, Henrik Old og Hergeir Nielsen mælti til at valbrøvini hjá hesum tingmonnum í norðaru helvt vórðu góðkend:

Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Jógvan við Keldu, Klaksvík, ff.,
Vilhelm Johannesen, Klaksvík, jf.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, tf.,
Niels Pauli Danielsen, Klaksvik, krf & fff.,
Jógvan I. Olsen, Toftir, sb.,
Edmund Joensen, Oyri, sb.,
Olaf Olsen, Glyvrar, ff.,
Signar Hansen, Fuglafirði, tf.,
Jørgen Thomsen, Skála, jf.,
Lasse Klein, Saltangará, sj.,
Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.,
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tf.,
Sune Jacobsen, Sørvági, sb.,
Svend Aage Ellefsen, Sandavági, ff.

Valbrøvini vóru góðkend við 31-0 atkvøðum.

Tá valbrøvini vóru góðkend, skipaði ellisformaðurin fyri vali av tingformanni og trimum næstformonnum eftir § 2, 2. stk. í tingskipani.

Eftir uppskoti frá Fólkaflokkinum, sum er størsti flokkur, varð Jógvan Sundstein valdur til tingformann. Við lutakasti millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin, sum eru eins stórir, varð Agnar Nielsen valdur til 1. næstformann. Jákup Lindenskov varð valdur til 2. næstformann og Hergeir Nielsen til 3. næstformann.

Nývaldi tingformaðurin tók formanssessin og skipaði fyri vali av tveimum tingskrivarum.

Eftir uppskoti frá Fólkaflokkinum varð Óli Breckmann valdur til 1. skrivara. Sambandsflokkurin skeyt upp at velja Flemming Mikkelsen til 2. skrivara, meðan Javnaðarflokkurin skeyt upp at velja Maritu Petersen. Við lutakasti varð Flemming Mikkelsen valdur til 2. skrivara.

Val av nevndum

Nevndir vórðu valdar 22. november 1988.

Formaðurin las skriv, dagfest 22. november 1998, frá Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, har boða varð frá,

at flokkarnir vóru gingnir saman í valbólk um val av løgtingsnevndum.

Fíggjarnevndin:
Fastir limir:
Anfinn Kallsberg, Poul Michelsen, Signar Hansen, Lasse Klein, Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, sum varð valdur í lutakasti við Edmund Joensen, Flemming Mikkelsen.
Tiltakslimir:
Svend Aage Ellefsen, John Petersen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Marita Petersen, Henrik Old, Pauli Ellefsen.

Marknaðarenevnd:
Fastir limir:
Svend Aage Ellefsen, Jógvan við Keldu, Hergeir Nielsen, Karin Kjølbro, Henrik Old, Jógvan I. Olsen, Marita Petersen, sum varð vald í lutakasti við Paula Ellefsen.
Tiltakslimir:
Jógvan Sundstein, Óli Breckmann, Jóngerð Purkhús, Jógvan Durhuus, Jørgen Thomsen, Agnar Nielsen, Jógvan Adolf Johannesson.

Fiskivinnunevnd:
Fastir limir:
Olaf Olsen, John Petersen, Signar Hansen, Tórbjørn Poulsen, Jógvan Adolf Johannessen, Sune Jacobsen, Henrik Old, sum varð valdur í lutakasti við Agnar Nielsen.
Tiltakslimir:
Jógvan við Keldu, Anfinn Kallsberg, Heini O. Heinesen, Hergeir Nielsen, Jákup Lindenskov, Edmund Joensen, Marita Petersen.

Nýval av formansskapi
Val av løgmanni og landsstýrismonnum
Nýval av nevndum

Ár 1989, mikudagin 18. januar var tingfundur. Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur boðaðu í skrivi frá, at hesir flokkar vóru gingnir saman í valbólk.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin boðaðu í skrivi frá, at hesir flokkar vóru gingnir saman í valbólk.

Síðani var val av formansskapi og tingskrivarum.

Hergeir Nielsen varð valdur til tingformann. Jákup Lindenskov varð valdur til 1. næstformann, Poul Michelsen til 2. næstformann og Agnar Nielsen til 3. næstformann.

Til 1. tingskrivara varð valdur Jógvan við Keldu og til 2. tingskrivara varð Flemming Mikkelsen valdur.

Á sama fundi fór fram val av løgmanni. Atkvøtt varð við seðlum. Jógvan Sundstein varð valdur til løgmann við 18 atkvøðum. 14 atkvøður vóru blankar.

Á seinri fundi sama dag skeyt løgmaður upp at velja hesar til landsstýrismenn:

Signar Hansen, Fuglafirði,
Finnboga Ísaksen, Tórshavn,
Karl Hera Joensen, Klaksvík,
Tord J. Niclasen, Eiði og
Anfinn Kallsberg, Viðareiði.

Við 18-0 atkvøðum vórðu teir valdir sum landsstýrismenn.

Á seinri fundi sama dag vórðu hesar nevndir valdar.

Fíggjarnevnd:
Fastir limir:
Heini O. Heinesen, Svend Aage Ellefsen, Tórbjørn Poulsen, Flemming Mikkelsen, Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Niels Pauli Danielsen.
Tiltakslimir:
Jógvan Durhuus, Poul Michelsen, Lasse Klein, Eilif Samuelsen, Atli P. Dam, Henrik Old, Tordur J. Niclasen.

Fiskivinnunevnd:
Fastir limir:
Jógvan Durhuus, Olaf Olsen, Tórbjørn Poulsen, Jógvan í. Olsen, Niels Pauli Danielsen, Henrik Old, Jógvan Adolf Johannessen.
Tiltakslimir:
Jóngerð Purkhús, John Petersen, Lasse Klein, Edmund Joensen, Tordur J. Niclasen, Marita Petersen, Jákup Lindenskov.

Marknaðarnevnd:
Fastir limir:
Karin Kjølbro, Olaf Olsen, Lasse Klein, Pauli Ellefsen, Atli P. Dam, Sune Jacobsen, Niels Pauli Danielsen.
Tiltakslimir:
Signar Hansen, Óli Breckmann, Tórbjørn Poulsen, Jógvan I. Olsen, Jørgen Thomsen, Agnar Nielsen, Tordur J. Niclasen.

Samferðslunevnd:
Heini O. Heinesen, John Petersen, Lasse Klein, Edmund Joensen, Agnar Nielsen, Jógvan Adolf Johannesen, Niels Pauli Danielsen.

Norðurlanda Ráðið:
Fastir limir:
Jógvan við Keldu, Atli P. Dam.
Tiltakslimir:
Sverd Aage Ellefsen, Jákup Lindenskov.

Tingnevndir

Valdar 16. februar 1989:

Rættarnevndin:
Marita Petersen,
Eilif Samuelsen
Jógvan við Keldu,
Jóngerð Purkhús,
Signar Hansen.

Skattanevndin:
Tórbjørn Poulsen,
Agnar Nielsen,
Atli Dam,
Signar Hansen,
Olaf Olsen.

Almanna- og heilsunevndin:
Jákup Lindenskov,
Niels P. Danielsen,
Karin Kjølbro,
Svend Aage Ellefsen,
Flemming Mikkelsen.

Mentannar- og skúlanevndin:
Lasse Klein,
Jógvan A. Johannesen,
Hergeir Nielsen,
Eilif Samuelsen,
Óli Breckmann.

Landbúnaðarnevndin:
Henrik Old,
Jógvan Durhuus,
Jógvan I. Olsen,
John Petersen,
Olaf Olsen.

Íðnaðarnevndin:
Jørgen Thomsen,
Eilif Samuelsen,
Niels Pauli Danielsen,
Heini O. Heinesen,
Jógvan við Keldu.

Umhvørvisnevndin:
Marita Petersen,
Edmund Joensen,
Jóngerð Purkhús,
Poul Michelsen,
Svend Aage Ellefsen.

Arbeiðaramálanevndin:
Vilhelm Johannesen,
Suni Jacobsen,
Jóngerð Purkhús,
Óli Breckmann,
John Petersen.

Landsstýrismálanevndin:
Hergeir Nielsen,
Óli Breckmann,
Suni Jacobsen.

Val av álitismonnum og nevndum

Sambært løgtingsmál nr. 82.

Valt 19. apríl 1989:

Umboðsmaður á aðalfundi hjá Floqsamband Føroya:
Hergeir Nielsen, Vági.

2 eftirlitsmenn við fongslini:
Ivan Johannesen, Miðvági.
Børge B. Hansen, Tórshavn.

Eftirlitsmaður hjá Føroya Lívstrygging:
Eyðun Viderø, Sandi.

Grannskoðari í Føroya Sparikassa:
Roymar Lamhauge, Tórshavn.

Førovskt Kirkjumál:
Svenning Tausen, Tórshavn,
Jørgen Thomsen, Skála.

Grønlandsfelagið:
Fastir limir:
Heðin Klein, Tórshavn,
Leivur Steintún, Sørvági,
Eilif Weihe, Sørvági.
Tiltakslimir:
Jørgen Niclasen, Sørvági,
Esmundur Jacobsen, Klaksvík,
Sune Jacobsen, Sørvági.

Landbúnaðarstevna:

Norðova sýsla:

Jógvan M. Joensen, Klaksvík,

Justinus Poulsen, Hvannasund,

Páll Østerø, Trøllanesi,

Samson Samson, Viðareiði,

Michael Matras, Klaksvík,

Arnhold Højgaard, Klaksvík,

Eysturovar sýsla:

Liggjas Hansen, Norðagøtu,

Rasmus Skorheim, Selatrað,

Arnhold Olsen, Runavík,

Jákup Olsen, Toftir,

Áslakkur Hansen, Norðagøtu,

Jákup Lamhauge, Runavík,

Streymovar sýsla:

Tummas Eikhólm, Hvalvík,

Adrian í Homrum, Kollafirði,

Jákup Joensen (Lago), Kvívík,

Vilhjálmur Patursson, Tórshavn,

Símun P. Jacobsen, Vestmanna,

Andrias Højgaard, Vestmanna.

Vága sýsla:

Thor Nielsen, Sandavági,

Guðmund Niclasen, Miðvágur,

Meinhard Jacobsen, Sørvágur,

Kári á Lofti, Sandavági,

Karlo Joensen, Miðvágur,

Ásmund Joensen, Sandavágur.

Sandovar sýsla:

Poul Jens Jacobsen, Skálavík,

Karlon R. Winther, Skopun,

Bjarni Sandoy, Sandi,

Zacharias Stórá, Skopun,

Birgir Mohr, Sandi,

Anfinnur Johannesen, Dali.

Suðurovar norðara sýsla:

Ísak Ziskasen, Hvalba,

Sverre Midjord, Tvøroyri,

Niels Pauli Olsen, Hvalba (yngri),

Hermund Michelsen, Øravík,

Robert Jespersen, Tvøroyri,

Suðuroyar sunnara sýsla:
Poul Johs. Poulsen, Sumba,
Jákup J. Joensen, Sumba,
Mikkjal Djurhuus, Vágur,
Knút Lisberg, Vágur,
Niclas Thomassen, Vágur,
Hans Olaf Andersen, Lopra.

Landsskúlaráð
Fastir limir:
Hans J. Debes, Tórshavn,
Jákup Mortensen, Tvøroyri.
Svenning av Lofti, Tórshavn,
Aksel Skoubo, Sandi,
Tiltakslimir:
Súni í Hjøllum,
Óli Bech, Vági,
Immanuel Dam, Kollafirði,
Johan Lamhauge, Toftir.

Landsskattanevndin:
Fastir limir:
Mikkjal á Bergi, Klaksvík,
Hergeir Nielsen, Vági,
Olaf á Stongunum, Tórshavn,
Ragnar Samuelsen, Klaksvík,
Sofus í Selvindi, Strendur.
Tiltakslimir:
Hanus undir Leitinum, Húsavík,
Súni í Hjøllum, Toftir,
Eyðun Anthoniussen, Toftir,
Kári D. Petersen, Tórshavn,
Olivur Joensen, Klaksvík.

Lokalnevnd viðvíkjandi virksemi løgreglunnar
Poul Michelsen, Tórshavn,
Jógvan Durhuus, Vestmanna,
Tórbjørn Poulsen, Tórshavn,
Eilif Samuelsen, Tórshavn,
Jákup Lindenskov, Tórshavn,

Nevnd viðv. nevningargrundlistum:

Sudurovar sýsla:

Áki Dimon, Tvøroyri,

Dávid Bech, Porkeri,

Poul Johs. Poulsen, Sumba,

Tórleivur Augustinussen, Vági,

Eiler Djurhuus, Tvoroyri.

Sandovar sýsla:

Anna Horn, Sandi,

Palle Dalsgaard, Skálavík,

Jørmund Olsen, Húsavík,

Louis Eystberg, Skopun.

Streymovar sýsla:

Tórstein Grækarisson, Kvívík,

Albert Hansen, Háskúlavegur 13, Tórshavn,

Kristian á Dul, Tórshavn,

Noomi Juul, Tórshavn,

Óla Jákup Gaard Olsen, Vestmanna

Vága sýsla:

Jónvør Petersen, Bø,

Hans Arni Nielsen, Sandavági,

Frits Jacobsen, Sørvágur,

Tórur Skálum, Sørvágur.

Eysturovar sýsla:

Ámundur Berthelsen, Strendur,

Símun Fornagarð, Kambsdal,

Poul M. Joensen, Fuglafirði,

Anna Berg, Skála,

Jenny Davidsen, Skála.

Norðova sýsla:

Arne Ziskasen, Klaksvík,

Andreas Andreasen, Klaksvík,

Jóan Magnus W. Høgnesen, Klaksvík,

Johs. Thomsen, Klaksvík,

Sámal Christiansen, Klaksvík.

Ráðleggingarnevndin fyri sjúkrahúsini:

Kristian Fr. Olsen, Klaksvík,

Helena Simonsen, Klaksvík,

Hans H. Strøm, Tvøroyri.

Sjónvarpsnevnd

Fastir limir:

Hans Jørgensen, Miðvág,

Dánjal Pauli Danielsen, Velbastað

Vagn Erik Mikkelsen, Tórshavn,

Schumann Hansen, Klaksvík.

Tiltakslimir:

Eyðun Andreasen, Tórshavn,

Levi Niclasen, Hvalba,

Albin Simonsen, Vestmanna,

Louis Zachariasen, Tórshavn.

Umboðsmaður á aðalfundi í Sjóvinnubankan:

Fastur limur:

Dánjal Andreassen, Lorvík,

varamaður:

Eliesar Arge, Tórshavn.

Sjúkrahústýrislimir til tey 3 sjúkrahúsini:

Klaksvíkar sjúkrahús:

Fastir limir:

Asbjørn Joensen, Klaksvík,

Obert Eliasen, Fuglafirði.

Karin Christiansen, Klaksvík.

Tiltakslimir:

Guttorm Klein, Klaksvík,

Anthonius Olsen, Klaksvik.

Elisabeth Steinberg, Klaksvík.

Landssjúkrahúsið:

Fastir limir:

Eli Davidsen, Tórshavn,

Helgi Øster, Tórshavn,

Liggjas Joensen, Tórshavn.

Tiltakslimir:

Niels Nattestad, Tórshavn,

Ásvør Árting, Tórshavn,

Dia P. Johannesen, Glyvrar.

Suðurovar sjúkrahús:
Fastir limir:
Hans H. Strøm, Tvøroyri,
Ove Mikkelsen, Vági,
Elsebeth Magnussen, Fámjin.
Tiltakslimir:
Johnhild Kjærbo, Vági,
Hjørleif Enni, Tvøroyri,
Jórun Jacobsen, Hvalba.

Í nevndina fyri Skipafelagið Føroyar:
Martin Joensen, Hvítanes,
Dánjal P. Danielsen, Velbastað.

Umboðsmaður á aðalfundi hjá Skipafelagnum Føroyar:
Fastur limur:
Hans Tausen Olsen, Runavík,
varamaður:
Heini O. Heinesen, Kunoy.

Í nevndina fyri P/f Smyril-Line:
Eldbjørn Joensen, Toftir,
William Holm Jacobsen, Tórshavn
Heðin Samuelsen, Suðurrás, Tórshavn
Ronald Poulsen, Tórshavn,
Knút Nolsøe, Tórshavn

Tingmannaráð Útnorðurs
Fastir limir:
Henrik Old,
Jóngerð Purkhús,
Lasse Klein,
Agnar Nielsen,
Svend Aage Ellefsen,
Niels Pauli Danielsen.

Tiltakslimir:
Vilhelm Johannesen,
Karin Kjølbro,
Tórbjørn Poulsen,
Pauli Ellerísen,
Poul Michelsen,
Tordur Niclasen.

Í umboðsráðið Tryggingarsambandið Førovar:
Hildur Patursson, Tórshavn,
Demmus Hentze, Tórshavn,
Edvard Hermansen, Hósvík,
Niels Pauli Danielsen, Klaksvík,
Tórfinn Smith, Tórshavn,
Jógvan Olsen, Toftir,
Sofus Sivertsen, Tórshavn.

Útvarpsnevndin:
Fastir limir:
Dan Petersen, Fuglafirði,
Heðin W. Olsen, Vestmanna,
Steingrim Niclasen, Tórshavn,
Poul Johan Djurhuus, Glyvrar.
Tiltakslimir:
Elin Jacobsen, Vági,
Beata L. Jensen, Tórshavn,
Ísak Mikladal, Klaksvík,
Árant Johannesen, Tórshavn,

Í nevndina fyri Vanlukkutryggingarráðið:
Fastir limir:
Helena Samuelsen, Tórshavn,
Hanna Lisberg, Tórshavn,
Karsten Hansen, Klaksvík.
Tiltakslimir:
Johan Samuelsen, Tórshavn,
Sonja Klein, Vatnsoyrar,
Heri Ellingsgaard, Klaksvík.

Yvirrísráð:
Dan Nielsen, Tvøroyri,
Dánjal Magnussen, adv., Tórshavn
Sigrid Dalsgaard, Hoyvík.

Lønarráðið:

Fastir limir:

Jørgen Thomsen, Skála,

Heini O. Heinesen, Kunoy,

Svend Aage Ellegsen, Miðvági,

Sune Jacobsen, Miðvági.

Tiltakslimir:

Henrik Old, Tórshavn,

Karin Kjølbro, Argir,

John Petersen, Skopun,

Agnar Nielsen, Vestmanna.

Samferðsluráðið:

Dánjal P. Dalbø, Syðrugøtu,

Sigfriður Vørðhamar, Fuglafirði.

Føroya Blindastovnur:

Fastur limur:

Olaf Olsen, Glyvrar,

Tiltakslimur:

Jógvan við Keldu, Klaksvík.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 56/1988 (vetrarting): Landsstýrismál.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 23. februar 1989 og beint í landsstýrismálanevndina.

Gerðabókin fevnir yvir tíðarskeiðið frá 3. august 1987 til 25. juli 1988.

Landsstýrismálanevndin hevur viðgjørt landsstýrisins avgerðir og hevur í hesum sambandi kannað fleiri av teimum málum, ið viðgjørd eru.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 3. august 1987 til 25. juli 1988 verður góðkend.

LANDSSTÝRISMÁLANEVNDIN, 28. mars 1989.

Hergeir Nielsen Óli Breckmann Suni Jacobsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080. Telex 81310 tingms fa. Telefax 14942. Postbox 64
Kvørteldsiumið: kl. 10—15, leygardag stongt

14. desember 1988

F. L. j. nr.
(at niskrifa á svarið) 400-42

JH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 57/1988: Fyribils fíggjarlóg.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um fyribils játtanarlóg fyri 1989.

§ 1. Til fíggjarlógin fyri fíggjarárið 1989 er viðtikin, verður landsstýrinum heimilað at uppkrevja skattir og gjøld eftir galdandi lógum. Landsstýrinum verður heimilað í sama tíðarskeiði at rinda neyðugar útreiðslur, soleiðis at landshúsarhaldið ótarnað kann fara fram og átiknar skyldur verða hildnar.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1989.

lagtingslov om midlertidig bevillingslov for 1989.

§ 1. Indtil finansloven for finansåret 1989 er vedtaget, bemyndiges landsstyre til at opkræve skatter og afgifter efter gældende love. Landsstyret bemyndiges til i samme tidsrum at afholde nødvendige udgifter, således at landshusholdningen uforstyrret kan fortsætte og påtagne forpligtelser opfyldes.

§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1989.

Viðmerkingar:

Tann 31. august 1988 legði landsstýrið fram uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1989. Uppskotið varð við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina. Formaðurin í fíggjarnevndini hevur nú boðað frá, at nevndin, orsakað av politisku støðuni, ikki sær seg føra fyri at koma við nøkrum áliti í málinum.

Um viðgerðin av fíggjarlógini ikki kann ætlast at verða liðug, áðrenn fíggjarárið byrjar, hevur landsstýrið eftir stýrisskipanarlógini skyldu til at leggja fram uppskot til fyribils fíggjarlóg.

Hetta er fyrstu ferð, at fíggjarlóg skal viðtakast, meðan eitt fyribils landsstýri sitir. Við lóg nr. 2 frá 3. januar 1985 varð fíggjarárið broytt til at vera kalendaraárið frá 1. januar 1986 at rokna, og í 1985 var viðtikin ein fíggjarlóg galdandi frá 1. apríl til 31. desember 1985.

Um uppskotið verður samtykt, ætlar landsstýrið at geva teimum einstøku stovnunum boð um at halda seg til eina nýtslu svarandi til játtanina hjá stovninum á fíggjarlógini fyri 1988.

Viðvíkjandi fiskivinnuni er tó at siga, at umframt veitingina á fíggjarlógini uppá 260 mió. kr. til minstuløn og annan stuðul, varð viðtikin ein eykajáttan uppá 120 mió. kr. fyri at forða fyri, at avreiðingarprisirnir fullu.

Landsstýrið ætlar tí, meðan bráðeingisfíggjarlógin er galdandi, at útgjalda tær upphæddir, sum neyðugar eru til at halda studningar og avreiðingarprisir óbroyttar.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080. Telex 81340 tinget fa. Telefax 14962 Postbox 64
Ugreiðslutíð: kl. 10—15. Ivirgangandi stongd

13. desember 1988

F. L. í. nr.
(at talskuna í svarinum) 2456-1

SJ/IM

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 58/1988: Keyp av bygningi til almenna fyrisiting.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um keyp av bygningi til almennu fyrisitingina.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa matr. nr. 156 í Tórshavn, fyri 5 mió. kr. og at taka upp lán til keypið.
2. stk. Harumframt verður landsstýrinum heimilað at brúka 3,5 mió. kr. til umbyggingina og at taka upp lán til hetta endamál.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om køb af bygning til landsadministrationen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe matr. nr. 156 i Tórshavn for 5 mio. kr. og til at optage lån til købet.
2. stk. Desuden bemyndiges landsstyret til at anvende 3,5 mio. kr. til ombygningen og at optage lån til dette formål.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar.

Á fundi í landsstýrinum tann 15. september 1988 varð treytað av játtan samtykt at taka av tilboði frá Tórshavnar býráði um keyp av matr. nr. 156 í núverandi líki fyri 3 mió. kr.

Bygningurin, matr. nr. 156, ið brúkast skal til almenna fyrisiting, er bygningur úti í Bakka á Tinganesi, har Wenzel Petersen hevur verkstað í løtuni.

Ætlanin er í fyrsta umfari at brúka bygningin til Almannastovu, av tí at hesin stovnur er ein av teimum almennu stovnunum, ið er ringast fyri, tá ið talan er um tørv á skrivstovuhølum.

Landsstýrið hevur í brævi dagfest 21. september 1988 lagt málið fyri Løgtingsins Fíggjarnevnd, ið noktaði at viðgera málið, tí mett varð ikki, at løgtingslóg nr. 31 frá 1987, har løgtingið heimilar landsstýrinum saman við fíggjarnevndini at byggja ella keypa hóskandi høli til almenna fyrisiting, gevur nevndini eina generella heimild til at keypa ognir til almenna umsiting.

Av tí at bygningurin í dag verður brúktur til smiðju, er neyðugt við stórum umvælingum. Í hesum sambandi skulu t.d. vindeygu skiftast út og allar installatiónir skulu gerast av nýggjum.

Landsstýrið biður tí um 3,5 mió. kr. afturat til hetta endamál.

Jóngerð Purkhús
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 58/1988(vetrarting): Keyp av bygningi til almenna fyrisiting.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 15. december 1988 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og innkallaði Gunnleyg Durhuus, landsarkitekt, at lýsa ymiskar spurningar og geva frágreiðing.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Fíggjarnevndin undirstrikar viðvíkjandi 3. broti í viðmerkingum landsstýrisins, at tikið verður undir við, at landið ognar sær høli til sína umsiting, meðan víst verður á, at serliga í Tinganesøkinum má landsstýrið verða fríari stillað viðvíkjandi nýtslu av teimum ognum, ið eru ella verða til taks.

FÍGGJARNEVNDIN, 15. december 1988.

Jørgen Thomsen	Jákup Lindenskov	Anfinn Kallsberg
Poul Michelsen	Flemming Mikkelsen	Signar Hansen
	Lasse Klein	

Jógvan Sundstein
Atli P. Dam
Pauli Ellefsen
Signar Hansen
Lassi Klein
Tordur Niclasen

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 59/1988(vetrarting): Gáva til hjálpararbeiði í sambond við jarðskjálvtavanlukkuna í Armenia.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið gevur landsstýrinum heimild til í bráðskundi at veita ta hjálp, vit eru førir fyri, við eini peningsupphædd upp til 200.000 - 300.000 kr. til hjálpararbeiði í samband við jarðskjálvtavanlukkuna í Armenia.

Upphæddin verður goldin úr grunninum til menningarhjálp.

Viðmerkingar:

Tað hevur verið vanligur siður, at vit frá føroyskari síðu hava veitt hjálp, og hildi verður, at tað eisini er rætt at veita hjálp í hesum føri, og at tað verður landsstýrið og løgtingsins fíggjarnevnd, ið avgera, hvussu hjálpin verður veitt.

Á FØROYA LØGTINGI, 15. desember 1988.

Jógvan Sundstein | Atli P. Dam | Pauli Ellefsen

Signar Hansen | Lassi Klein | Tordur Niclasen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 61310 tinghs fo . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðsluskeið: Kl. 10—15, leygardag stongt

11. januar 1989

F. L. j. nr. (at tilskilja í svari) 1300-1-8

KlH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 60/1988 (vetrarting): Leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum v.m.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um leingjan av ávísum lønarsáttmálum og avtalum v.m.	Lagtingslov om forlængelse af visse lønoverenskomster og aftaler m.v.
§ 1. Sáttmálarnir við protokollatum um lønar- og arbeiðsviðurskifti millum Føroya Landsstýri og Økonomaforeningen, Føroya Landsstýri og Landssammenslutningen af hospitalslaboranter, Føroya Landsstýri og Ergoterapeutforeningen og Føroya Landsstýri og Danske Fysioterapeuter, ið vóru galdandi til 1. juni 1988, verða longdir til 1. juni 1989 við hesum broytingum:	§ 1. Overenskomsterne med tilhørende protokollater om løn- og arbejdsforhold mellem Færøernes Landsstyre og Økonomaforeningen, Færøernes Landsstyre og Landssammenslutningen af hospitalslaboranter, Færøernes Landsstyre og Ergoterapeutforeningen og Færøernes Landsstyre og Danske Fysioterapeuter, der var gældende indtil 1. juni 1988 forlænges til 1. juni 1989 med følgenda ændringer:
1) Sum serstakir frídagar eru at rokna jólaaftan,	1) Som særlige fridage er

nýggj ársaftan, páskaaftan, flaggdagur, hvítusunnuaftan, grundlógardagur aftaná kl. 12.00, ólavsøkuaftan aftaná kl. 12.00 og ólavsøkudagur. 1. mai verður ikki roknaður sum frídagur. Fyri arbeiði omanfyri nevndu frídagar verða latnar somu sømdir, sum fyri arbeiði halgidagar, sum ikki eru sunnudagar.

2) Frá tí degi, arbeiðið verður uppafturtikið, verður veitt eitt ikki eftirløngevandi ískoyti uppá 210 kr. um mánaðin. Ískoytið verður innroknað í komandi generellu lønarhækkingar.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

at regne: Juleaften, nytårsaften, påskelørdag, flagdagen, pinselørdag, grundlovsdag efter kl. 12.00, olaiaften efter kl. 12.00 og olaidagen, 1. mai regnes ikke som særlig fridag. Arbejde på ovennævnte særlige fridage aflønnes efter samme regler som er gældende for arbejde på skæve helligdage.

2) Fra den dag, arbejdet bliver genoptaget, ydes et ikke pensionsgivende tillæg på 210 kr. om måneden. Tillægget bliver indregnet i kommende generelle lønforhøjelser.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Framlagda uppskot til løgtingslóg hevur til endamáls at gera ein enda á verkfallinum á sjúkrahúsum landsins, sum fyri økonomurnar og fysio- og ergoterapeutarnar hevur vart síðani 02.11.1988 og fyri laborantarnar síðani 01.12.1988.

Orsøkin til, at landsstýrið kemur við einum lógaruppskoti, er, at allar royndir at samráðast og semjast um ein sáttmála millum yrkisfeløgini í verkfalli og landsstýrið eru dotnar niðurfyri.

Nú ið tað ikki longur er ráðiligt at lata standa til á sjúkrahúsum landsins so støða sjúklinganna kann koma í vanda - ella at tað sæð longri fram hevði verið landinum at bága - sær landsstýrið sær ongan annan møguleika, enn at seta lóg í gildi á hesum øki.

Víst verður somuleiðis á framløgdu frágreiðing landsstýrisins í málinum.

Viðmerkingar til §§:

§ 1. 1) Sáttmálarnir, talan er um, gingu út tann 1. juni 1988.

Í nevndu sáttmálum stendur, at teir standa við eftir 01.06.1988, um ikki nýggir sáttmálar eru gjørdir innan ta tíð. Somuleiðis er í protokollatum frá 28.03.87 og 03.04.1987 avtalað, at sjálvstøðugir føroyskir sáttmálar koma í staðin fyri teir verandi.

Tað, sum landsstýrið skjýtur upp, er, at bæði sáttmálar og protokollat verða longd til 1. juni 1989, soleiðis at samráðingar millum landsstýrið og føroysku yrkisfeløgini um nýggjar sjálvstøðugar sáttmálar verða tiknar upp frá hesum degi. Við at lóggeva á økinum eru aftur sáttmálar á økinum, sum binda partarnar. Sostatt stríðir eitt og hvørt verkfall ímóti lógini, tá hon er komin í gildi.

Einasta broytingin í galdandi sáttmálum er tann, at feløgini fáa føroysku frídagarnar, sum eisini aðrir bólkar innan sjúkrahúsverkið fingu, tá skift varð yvir til føroyskar sáttmálar.

§ 1. 2) Landsstýrið skjýtur upp, at eitt ikki eftirløngevandi ískoyti uppá 210 kr. um mánaðin verður veitt. Samstundis verður skotið upp, at hetta ískoyti verður innroknað í komandi lønarhækkingar. Hetta varð boðið feløgunum undir samráðingunum og ynskir landsstýrið at halda fast við hetta í lógini.

Landsstýrið hevur undir samráðingunum treytað sær, at ískoytið verður innroknað í komandi lønarhækkingar og ynskir landsstýrið somuleiðis at halda fast við hetta.

Ískoytið verður veitt frá tí, arbeiðið verður uppafturtikið.

§ 2. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Atli P. Dam
løgmaður

/
/ Klaus Hermann

Frágreiðing.
SD/cr

Frágreiðing viðvíkjandi verkfallsstøðuni innan sjúkranúsverkið.

Landsstýrið gjørdi á vári 1987 sáttmála ymisk donsk fakfeløg, hvørs limir arbeiða inna heilsuverk Føroya. Sáttmálarnir, tað snúði seg um, vóru endurnýggjing av sáttmálunum millum Da Sygeplejeråd og Førova Landsstýri, nýggjan sát mála millum Landssammenslutningen af Hospitals laboranter og Landsstýrið og sáttmáli, sum var gjørdur fyri fyrstu ferð við ergoterapeutar, fysioterapeutar og økonomur. Sáttmálasamráðing nar komu í lag aftaná at 4 tey seinast nevndu feløgini høvdu blokerað størv innan heilsuverk í fleiri mánaðir.

Felags fyri sáttmálarnar, ið gjørdir vór var, at partarnir góðtóku sáttmálarnar, millum tey respektivu feløgini og amtsráðsfereiningin Danmark, og síðani vórðu nakrar fáar broytinga gjørdar. Størsta broytingin var tann, at arbei tíðin framyvir eisini skuldi vera 40 tímar, ho fór 1. januar 1987 niður á 39 tímar í Danmark, men fyri hetta varð tann sonevnda "Føroya-viðb tin" reguleraða, soleiðis at hetta gav ein gene rellan lønarvøkstur uppá 33 í mars 1987, men v henda viðbótin reguleraða heilt aftur til 1. ap 1985. Eisini vórðu reglurnar um barnsburðarfar loyvi broyttar soleiðis, at limir í feløgunum fingu fulla løn í 20 vikur í samband við barns burð eins og aðrir føroyskir fakbólkar.

Í samband við semjuna varð avtalað, at sáttmálin skuldi ganga út 1. juni 1988. Í samba við sáttmálarnar varð avtalað, at hetta var sei astu ferð, landsstýrið gjørdi sáttmálar við don fakfeløg, og pliktaðu feløgini seg til at sjál støðugir føroyskir sáttmálar skuldu gerast við landsstýrið. Eisini var avta-

lað, at møguleikarnir skuldu kannast fyri sjálvstøðugum føroyskum eftirlønarskipanum.

Sum ein fylgja av hesum hevur landsstýri februar í 1988 gjørt sáttmála við Sjúkrasystra felag Føroya soleiðis, at sáttmálin við Dansk Sygeplejeråd varð framlongdur til 1. juni 1989 men at Sjúkrasystrafelag Føroya kom inn sum sá málapartur, tá felagið hevði skipað seg í Føroyum, og hendi hetta 1. oktober í fjør. Í hesum sambandi fingu limir felagsins nakrar frídagar aftrat. Annars er sáttmálin óbroyttur. Landsstýrið hevur eisini gjørt sáttmála við Sjúkrahjálparafelag Føroya, teir hava ongan sáttmála havt frammanundan, men er hann á sama støði og eftir somu treytum, sum tann hjá sjúkrasystrun við einstøkum undantøkum. Hvat viðvíkur bólkun ið nú eru í verkfalli, hevði landsstýrið fund bólkarnar í juni mánað í fjør. Bólkarnir greiddu frá, at teir høvdu skipað seg sum sjálvstøðugar føroyskar deildir av teimum donsku feløgunum, vildu ikki slíta sambandið við donsku feløgini tí tað meintu tey at tey vóru ov fá til, og eisini høvdu tey avgjørt at samráðast í felag. Limatalið í feløgunum er tilsamans 70 fólk, ei 55 heiltíðarstørv. Á fundinum í juni mánaði va avtalað, at feløgini skuldu gera upplegg til førovskan sáttmála og varð fundur avtalaður at vera 7. oktober 1988.

Á fundinum løgdu partarnir fram uppskot sáttmála, sum í stóra heila líkist danska sáttmálanum, sum fór úr gildi 1. juni 1988, tó við ávísum broytingum. Lønin fyri forskotna arbeiðstíð skuldi roknast sum prosentpartur av lønini Eisini skutu tey upp eina nýggja lønartalvu og lønin skuldi hækkast 7% eins og at øll størv, talan var um, skuldu umklassifiserast. Á fundinum, sum vardi allan 7. oktober, vóru sáttmálauppskotini gjøgnumgingin, og vóru ikki tær stó

ósemjurnar hesum viðvíkjandi, burtursæð frá sa sýningini fyri forskotna arbeiðstíð. Landsstýr gjørdi felǿgunum greitt, at landsstýrið ikki vildi samráðast um generellar lønarhækkingar o umklassifiseringar nú, men skeyt upp, at tann sáttmálin, sum varð gjørdur, gekk út 1. juni 1 og kundu bólkarnir tá, eins og aðrir partar á almenna arbeiðsmarknaðinum tosa um løn í samba við nýggjan sáttmála.

Hesum avvístu felǿgini, og boðaðu dagin eftir frá, at tey høvdu avgjørt at fara í verk- fall orsakað av hesum spurningi.

Her skal verða roynt at greiða eitt sind frá, hví landsstýrið hevur tikið tá støðu, ikk at geva munandi generellar lønarhækkingar nú.

Í sáttmálanum, ið varð gjørdur í mars 19 eru lønirnar hjá bólkunum í verkfalli regulera eftir sáttmála millum amtsráðsfereiningina og felǿgini. Hetta hevur givið felǿgunum ein gene- reilan lønarvøkstur uppá góð 12%, eins og tey flestu av teimum eisini hava fingið sína ávisa umklassifisering, so samlaði lønarvøksturin í tíðarskeiðinum frá 1. apríl 1987 og fram til t sum landsstýrið skjýtur upp 1. juni 1989, verð ein lønarhækking uppá umleið 13%.

Tey felǿg, sum landsstýrið hevur sáttmála við, og eru tey umleið 20 í tali, hava í sama sáttmálaskeiði fingið ein lønarvøkstur, sum liggur millum 10,4% og góð 12% í generellum løn arvøkstri, harumframt eru gjørdar einstakar um- klassifiseringar, serliga innanfyri starvsmanna felagsøkið.

Landsstýrið heldur tó fast við, at bólk- arnir innan heilsuverkið hava fingið somu lønar hækking sum onnur føroysk felǿg, og metir ikki, at felǿgini hava kunna dokumenterað, at tey lønarliga eru afturútsigld í mun til føroyskar lønir.

Niðanfyri er uppsett ein sammeting milli útviklingin í føroyska lønarlagnum í inniverar sáttmálaskeiði og í danska.

1) Føroysku starvsmannalønirnar hækkaðu 1. juni 1987 við 8,07% og 1. juni 1988 við 3,7%. Tilsamans er hækkingin í inniverandi sáttmálaskeiði 12,07% í meðal.

Lønirnar hjá bólkunum, ið eru í verkfall eru hækkaðar á henda hátt:

1. apríl 1987 hækkaði lønin við 6,64% og apríl 1988 við 5,46%. Tilsamans 12,10%. Umfram grundlønina fáa bólkarnir eina sonevnda føroyaviðbót, og var hon við sáttmálasamráðingarnar mars í fjør hækkað við 60,29% ella 3% av samla lønini. Orsøkin til at henda hækking var so at var at arbeiðstíðin í Danmark 1. januar 1987 - niður í 39 tímar um vikuna. Umroknað í peningi hetta 2,53%. Tann vanliga hækkingin 6,64% + 2, gevur 9,17%, t.v.s. okkara hækking liggur hægri 6,64% + uml. 3%.

2) Feløgini hava eisini ført fram undir samráðingunum at 1. september í fjør fór arbeiðstin í Danmark niður á 38 tímar, og skuldu tey tí eina kompensatión fyri 32 tímar ella 2,63%. Ef landsstýrisins meting fáa tey hesa kompensatión við at landsstýrið hevur boðið teimum umleið 5 frídagar eyka, ella o.u. 45 tímar, og skuldi tað saman við hækkingini fyri tann fyrra tíman giva fulla kompensatión.

Feløgini hava eisini ført fram við grundlag í ársfrágreiðingini fyri Føroyar, at vøkstin á tí føroyska arbeiðsmarknaðinum hevur verið størri enn hvat teirra løn er hækkað í tíðarskeiðinum frá 1975 fram til dagin í dag. Landsstýrið er ikki samt í hesi meting, og heldur fram við, at eingin dokumentatión fyriliggur um at bólkarnir eru lønarliga afturútsigldir í mun til aðrar bólkar.

Hvat viðvíkur hagtølum sum dokumentatión er gjørd út frá er at siga at Hagdeildin upplý at eingin rættiliga veit, hvussu tølini eru un gjørd. Okkurt er lagt aftrat fyri skeivar halg dagar, men verður ein kanning gjørd av hesum.

Eftir hvat landsstýrið hevur skilt, hava bólkarnir sammet tølini í ársfrágreiðingini at vera lønina hjá laboranti á 20. lønarstigi, tr toløn ávikavist í 1975 og 1. januar 1987. Tá laborantur er komin á 20. lønarstig, arbeiðir hann á 9. ári. Rættast má tí vera at sammeta v ein assistent á 9. ári. Sammetingin fer at síg soleiðis út:

Assistentur 9. stig: 1975 29,83 kr. og 1987 72 kr.

Laborantur á 20. lønarstigi: 1985 31,49 kr. og 1987 79,13 kr.

Av hesum sæst at lønarvøksturin hjá labo antunum hevur verið eitt sindur hægri enn tann hjá assistentunum.

Eisini er gjørd ein sammeting av byrjuna og endaløn hjá bólkunum í verkfalli við sambær ligar bólkar. Bruttoløn 1. oktober 1987

	Byrjunarløn	Endaløn
1)Laborantar	14.978,17	16.869,
Økonomur	14.978,17	16.186,
Ergoterapeutar og fysioterapeutar	15.363,34	17.407,
Sjúkrasystrar	14.978,17	16.670,
Pedagogar á serfor-sorgarstovnum	15.257,90	16.729,
Assistentar	12.849,88	15.299,
Handverkarar	12.807,45	15.255,
Sjúkrahjálparar	13.716,18	15.485,

Undir teimum samráðingum, sum verið hava partanna millum síðan felløgini fráboðaðu at fa í verkfall ávikavist tann 1. november og 1. des

ember var seminsmaðurin boðsendur um mánaðarskifti oktober/novembsr. Í hesum sambandi sett landsstýrið fram tað uppskot, at man ístaðin f at brúka lønarstigini hjá amtsráðsforeiningini fór yvir at brúka lønarstigini eftir sáttmálan millum landsstýrið og Tænastumannafelag Landsi Hetta hevði givið hólkunum í verkfalli eina lø arhækking uppá millum 1 og 2 %. Hesum avvístu feløgini, tí hetta var ein ov lítil lønarvøkst ur.

Landsstýrið hevur síðan boðið feløgunum ein ávís krónu upphædd verður løgd afturat hvø um lønarstigi, og hetta verður innroknað í løn við sáttmálasamráðingarnar í vár. Feløgini eru sinnað at ganga einum slíkum yneki á møti, men enn ikki semja um støddina á hesum krónutali. Feløgini have kravt 500 kr. afturat fyri hvønn meðan landsstýrið hevur sagt, at tað longsta s farast kann er uppá uml. 250 kr. um mánaðin. Hetta vildi givið ein lønarvøkstur uppá millum 1,5 cg 1,75 %.

Orsøkin til at landsstýrið ikki heldur s kunna fara longri er, at enn vita vit onki um lønarvøksturin í vár og eisini má samhaldsfast eftirlønargrunnurin havast í huga.

Tað sum feløgini serliga hava hongt seg er tað at tá ein sáttmáli er farin úr gildið o samráðast skal um ein nýggjan sáttmála, er tað eitt náttúrligt krav, at feløgini ynskja hægri løn og halda feløgini, at landsstýrið átti at gjørt teir varar við hendan spurningin longu í juni mánaða. Møguliga kundi landsstýrið gjørt hetta, men er tað ikki vanligt at seta forhond treytir áðrenn farið verður undir samráðingar. Landsstýrið hevði eisini áðrenn farið var undir samráðingar við feløgini, forlongt sáttmálan vi

XC032X

sjúkrasystrarnar og somuleiðis var sáttmál:
dur við pedagogar á serforsorgarstovnum, s
tænastumenn og sum fingu ein sáttmála, sum
gjørdur eftir somu prinsippum sum tað lands
hevur boðið bólkunum í verkfalli. Hesi viðt
ti kunnu feløgini ikki hava verið heilt óku
við 7. oktober.

Samanumtikið sær ikki út til at ósemj
kann loysast við samráðingum og verður mælt
at málið verður lagt fyri løgtingið.

Á Landsskrivstovuni 10. januar 1989

Súsanna Danielsen
deildarleiðari

Á l i t

í

løgtingsmáli nr.60/1988: Leinging av óvísum lønarsáttmálum og avtalum v.m.

Málið er framlagt av 12. januar 1989 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í serliga 6-manna nevnd.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við umboð við feløgini í verkfalli og við leiðaran fyri lønardeild landsstýrisins.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tórbjørn Poulsen, Signar Hansen, Niels Pauli Danielsen, Henrik Old og Svend Aage Ellefsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins og ger vart við, at umtalaðu bólkar fáa somu sømdir sum tey, ið áður eru farin til føroyskan sáttmála innan heilsuverkið.

Minnilutin (Eilif Samuelsen) førir fram, at í eini sáttmálaósemju á privata arbeiðsmarknaðinum kann tað í ávísum førum vera neyðugt at gera eitt samingsuppskot til lóg, um tingið heldur, at týðandi samfelagsáhugamál standa upp á spæl.

Harafturímóti er tað órímuligt, táið landsstýrið er annar parturin í málinum, at leggja slíkar trætuspurningar fyri lóggávuvaldið.

Minnilutin tekur ikki undir uppskoti landsstýrisins og setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um at royna enn einaferð at koma til eina semju í málinum, møguliga í samvirkan við samingsstovnin.

SERLIGA 6-MANNANEVNDIN, 12. januar 1989.

Tórbjørn Poulsen	Signar Hansen	Niels Pauli Danielsen
Henrik Old	Svend Aage Ellefsen	Eilif Samuelsen

Føroya Javnaðarflokkur

Føroya Løgting
her.

Løgtingsmál nr. 61/1988: Bann móti handli við Suðurafriku og Namibiu.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um bann móti handli við Suðurafriku og Namibiu.

§ 1. Innflutningur til Føroya av vørum og tænastuveitingum við uppruna í Suðurafriku ella Namibiu og útflutningur av vørum og tænastuveitingum úr Føroyum til Suðurafriku ella Namibiu er bannaður.
Stk. 2. Reglurnar í stk. 1 fevna ikki um
1) inn- og útflutning, ið ikki er av vinnuligum slag og
2) útflutning av framleiðsluni til einans læknalig endamál.

lagtingslov om forbud mod handel med Sydafrika og Namibia.

§ 1. Indførsel til Færøerne af varer og tjenesteydelser med oprindelse i Sydafrika eller Namibia og udførsel af varer og tjenesteydelser fra Færøerne til Sydafrika eller Namibia må ikke foretages.
Stk. 2. Bestemmelserne i stk. 1 omfatter ikke
1) ind- og udførsel, der ikke har erhvervsmæssig karakter og
2) udførsel af produkter til rent lægelige formål.

§ 2. Bannið móti handli við Suðurafriku og Namibiu fevnir eisini um flutning av olju og oljuúrdráttum við føroyskum skipum til og úr Suðurafriku og Namibiu.

§ 3. Landsstýrið kann veita undantaksloyvi frá banninum í §§ 1 og 2.

§ 4. Persónar, herundir nevndarlimir í virkjum, ið bróta §§ 1 og 2, verða revsaðir við bót ella hefti.
Stk. 2. Er brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sjálvt koma undir bót.

§ 5. Tá ætlan ST's um sjálvstýri fyri Namibiu verður sett í verk er landsstýrinum heimilað við kunngerð at strika orðingina "ella/og Namibiu" í § 1 og 2.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2. Forbudet mod handel med Sydafrika og Namibia omfatter også transport af olie og olieprodukter med færøske skibe til og fra Sydafrika og Namibia.

§ 3. Landsstyret kan dispensere fra forbudet i §§ 1 og 2.

§ 4. Personer, herunder bestyrelsesmedlemmer i virksomheder, der overtræder §§ 1 og 2, straffes med bøde eller hæfte.
Stk. 2. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 5. Når FN's plan om selvstyre for Namibia iværksættes, bemyndiges landsstyret til med bekendtgørelse at slette ordene "eller/og Namibia" i § 1 og 2.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Fráfarandi løgmaður eins væl og uttanríkisráðharrin hava mett tað avgjørt moralska og politiska treyt, at einhvør samgonga, ið átók sær at stýra Føroyum hetta valskeiðið, fór at átaka sær at loysa tað vandamál, sum samvinnan við Suðurafriku og ta hersetingarstjórn, sum Suðurafrika hevur sett í Namibiu, er vorðið Føroyum.

Einasta norðurland, ið ikki enn hevur samtykt bann móti samvinnu við apartheitstýrið í Suðurafriku, eru Føroyar. Fyri fáum vikum síðani tóku grannar okkara íslendingar undir við hinum norðanlondunum í slíkum banni. Hetta sama ger meginparturin av demokratiska heiminum, og frættu vit íggjár, at nú eru fimm samveldisstatir í U.S.A., ið "boykotta" sama apartheitstýri. Hesir eru: Maryland, Michigan, North Carolina, Rhode Island og Masachussetts.

Umdømi Føroya tolir ikki hesa støðu, og fær hon so líðandi vinnuligar og búskaparligar avleiðingar fyri okkum.

Nú liggur á ljóði, at nývalda samgongan onga semju hevur gjørt um at lima Føroyar inn í tann bólk av londum, sum eftir umbøn meirlutans í Suðurafriku og Namibiu hava sett sær fyri at avtaka hesa ræðuligu apartheitskipan.

Føroya fólk hevur krav uppá at vita, um tað verunliga er so, at ein tingmeiriluti átekur sær at stýra hesum landi uttan avtalaða parlamentariska stýrki til at loysa eitt hitt týdningarmesta uttanríkispolitiska málið, uppi hevur verið í mong ár.

Er tað so, kann tað ikki samsvara við lýsta setningin, at Føroyar eiga at útvega sær størri uttanríkispolítiskar heimildir.

Er tað so, kann ikki annað sigast, enn at samgongan sýnir politiska líkasælu og ger seg samseka í teirri politisku bjarnatænastu, fram ímóti svarta meirilutanum í Suðurafriku/Namibiu og ímóti Føroyum.

Miðjan november 1988 vóru umboð fyri grønlendska trolaraflotan og grønlensku fiskivinnuumsitingina á veg til Føroya at samráðast við føroyskar skipaeigarar um leigu av skipum at taka lut í tí virksemi, sum tekur seg upp, nú toskaveiðan vestanfyri økist so munardi.

Ftlandi skulu eini 10-20.000 tons av banktoski latast verksmiðjuskipum til virkingar, umframt at skip skulu taka ímóti á firðum og í Diskovikini. Aftrat koma ætlanirnar um virksemið í Føroyingahavnini, har møguliga 6.000 tons kunnu virkast í 1989 og/ella 1990.

Grønlendingar - samríkismenn okkara, sum av góðum grundum eru serliga erkvisnir um rasuskilnaðarpolitikk - steðgaðu hesum umboðum í Keypmannahavn, tá tað kom í ljósmála, at føroyingar mótvirkaðu tí suðurafrikapolitikki, ið Fólkatingið hevur samtykt.

Norskir, týskir og aðrir verksmiðjutrolarar hava leingi ligið framvið at útvega sær møguleikar at virka hendan fisk, og vandi er fyri, at vit gerast ov seinir á sjóvarfallinum. Hetta er dupult spell nú loyvda veiðan eystanfyri er so munandi skerd.

Ljóðað hevur, at tjóðveldisflokkurin hevur "tryggjað" sær loysn innan 5. februar, men er hon tann - framsett í donskum blað - at flokkurin skal út um samgonguna at leita sær stuðul, kann henda, at slík loysn verður ódrúgv, og vandi er fyri, at vit tá longu hava spælt okkum møguleikar av hendi.

Onnur loysn, vist hevur verið til, er at Namibia fær sjálvstýri um stutta tíð. Hendan loysn røkkur kortini ikki, tí Walvis Bay verður framvegis suðurafrikanskt øki, og felagið, føroysk skip samvinna við, framvegis suðurafrikanskt. T.d. liggja skip okkara nú til umvælingar í suðurafrikanskari havn og fiskiskapur er farin fram í suðurafrikanskum sjógvi.

Hetta er ímóti tí politikki, demokratisk lond reka, og fer framvegis at vera andsøgn til politikk teirra.

Málið hevur fyrr verið á tingi, og hevði landsstýrið tá hesar viðmerkingar:

"Fleiri lond hava sett ymisk tiltøk í verk móti Suðurafriku fyri at mótmæla apartheitpolitikkinum í hesum landi.

Í norðanlondum hava Danmark og Noreg samtykt lógir, sum banna øllum handli við Suðurafriku og Namibiu, og í hinum norðanlondum verður umhugsað at viðtaka tilsvarandi lógir.

Landsstýrið heldur, at Føroyar eiga at taka undir við tiltøkum, sum kunnu vera við til at steðga apartheitpolitikk-

inum í Suðurafriku, og setir við hesum fram uppskot til løgtingslóg um bann móti handli við Suðurafriku.

Lógin fevnir um vanligan handil, tænastuveitingar, flutning av olju og oljuúrdráttum við føroyskum skipum til og úr Suðurafriku og Namibiu.

Í øðrum tingmáli er lagt uppskot fyri tingið um at seta kgl. fyriskipan í gildi fyri Føroyar, ið forbjóðar øllum handli og flutningi av krigsútgerð til Suðurafriku."

Í mun til lógaruppskotið er gjørd tann broyting, at tá ST-samtyktin um sjálvstýri fyri Namibiu verður sett í verk, kann landsstýrið við kunngerð koyra orðini "ella/og Namibiu" úr lógini.

Men hetta tekur sum nevnt ikki burtur bannið ímóti at samvirka við felløg við heimstaði í Suðurafriku.

Á Føroya Løgtingi, 18. januar 1989

vegna Føroya Javnaðarflokk

Atli P. Dam

Álit

í

løgtingsmáli nr. 61/1988: Bann móti handli við Suðurafrika og Namibia.

Málið er framlagt av Føroya Javnaðarflokki tann 18. januar 1989 og eftir 1. viðgerð 10. februar 1988 beint í marknaðarnevndina. Hetta var felags 1. viðgerð við tingmáli nr. 62/1989, ið hevur sama heiti og varð framlagt av landsstýrinum hin 18. januar 1989 og beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluta.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Olaf Olsen, Lasse Klein og Kári Kjelnæs) tekur ikki undir við uppskoti javnaðarfloksins og vísir til álitið í tingmáli nr. 62/1989.

Minnilutin (Atli Dam) vísir til álitið í løgtingsmáli nr. 62: Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.

Minnilutin (Suni Jacobsen og Jógvan I. Olsen) vísir til álitið í løgtingsmáli nr. 62: Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.

MARKNAÐARNEVNDIN, 17. februar 1989.

Karin Kjølbro — Olaf Olsen — Jógvan I. Olsen

Suni Jacobsen — Kári Kjelnæs — Lasse Klein

Svend Aage Ellefsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080. Telex 81310 tingms fa. Telefax 14942. Postbox 64
Skrivstovutími: kl. 10—15, leygardag stongt

8. februar 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 10-2-17

JH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 62/1988: Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.

I. U p p s k o t

til

løgtingslóg um forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.

§ 1. Innflutningur til Føroya av vørum og tænastuveitingum við uppruna í Suðurafrika ella Namibia og útflutningur av vørum og tænastuveitingum úr Føroyum til Suðurafrika ella Namibia er forboðin.
Stk. 2. Reglurnar í stk. 1 fevna ikki um
1) inn- og útflutning, ið ikki er av vinnuligum slag og
2) útflutning av framleiðsluni til einans læknalig endamál.

lagtingslov om forbud mod handel med Sydafrika og Namibia.

§ 1. Indførsel til Færøerne af varer og tjenesteydelser med oprindelse i Sydafrika eller Namibia og udførsel af varer og tjenesteydelser fra Færøerne til Sydafrika eller Namibia må ikke foretages.
Stk. 2. Bestemmelserne i stk. 1 omfatter ikke
1) ind- og udførsel, der ikke har erhvervsmæssig karakter og
2) udførsel af produkter til rent lægelige formål.

§ 2. Forboðið fyri handli við Suðurafrika og Namibia fevnir eisini um flutning av olju og oljuúrdráttum við førovskum skipum til og úr Suðurafrika og Namibia.

§ 3. Landsstýrið kann veita undantaksloyvi frá forboðnum í §§ 1 og 2.
Stk. 2. Tann innflutningur og útflutningur, sum nevndur er í § 1, stk. 1 kann tó fara fram inntil 1. mars 1990.

§ 4. Persónar, herundir nevndarlimir í virkjum, ið bróta §§ 1 og 2, verða revsaðir við bót ella hefti.
Stk. 2. Er brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sjálvt koma undir bót.

§ 5. Tá Namibia hevur fingið sjálvstýri, er landsstýrinum heimilað við kunngerð at strika orðingina "ella/og Namibia" í §§ 1 og 2.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi 1. mars 1989.

§ 2. Forbudet mod handel med Sydafrika og Namibia omfatter også transport af olie og olieprodukter med færøske skibe til og fra Sydafrika og Namibia.

§ 3. Landsstyret kan dispensere fra forbudet i §§ 1 og 2.
Stk. 2. Den indførsel og udførsel, som er nævnt i § 1, stk. 1 kan dog finde sted indtil 1. marts 1990.

§ 4. Personer, herunder bestyrelsesmedlemmer i virksomheder, der overtræder §§ 1 og 2, straffes med bøde eller hæfte.
Stk. 2. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 5. Når Namibia har opnået selvstyre bemyndiges landsstyret med bekendtgørelse at slette ordene "eller/og Namibia" i §§ 1 og 2.

§ 6. Denne lov træder i kraft den 1. marts 1989.

II. U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya løgting og Føroya landsstýri fagna tí friðaravtalu, sum stríðandi partarnir í sunnara Afrika hava undirskrivað við undirtøku frá USA, Sovjet og ST-felagskapinum, og sum ber í sær afturtøku av kubanskum og suðurafrikonskum hermonnum úr Angola og sjálvstýri fyri Namibia við fríum valum.

Løgtingið ynskir at stuðla, serliga í fiskisamvinnu, einum sjálvstøðugum og demokratiskum Namibia í tann mun, sum lítla land okkara maktar, um áhugi er frá namibiskari síðu fyri slíkum stuðuli.

Viðmerkingar.

Apartheidpolitikkurin í Suðurafrika hevur ført við sær, at bæði ST og fleiri lond hava gjørt samtyktir og framt lóggávu um ymisk tiltøk mótvegis landinum.

Eitt vanligt tiltak er at banna handli við Suðurafrika. Ymiskt er, sum mett verður um ávirkanina av tílíkum tiltøkum, men í summum pørtum av heiminum verður hetta hildið at vera rættur politikkur.

Norðurlond hava gjørt ein sokallaðan "handlingsplan" viðvíkjandi teirra Suðurafrikapolitikki og hevur hetta ført við sær, at hesi lond hava satt í verk bann móti handli við Suðurafrika.

Danmark hevur gingið á odda millum Norðanlond við at herða lóggávuna, og tá ið danska lógin frá juni 1986 varð samtykt, var tað andstøðan í Fólkatinginum, sum atkvøddi fyri, meðan stjórnarflokkarnir ikki atkvøddu. Undir viðgerðini varð lógin eisini brovtt og herd. Hini Norðanlondini høvdu tá eina nógv linari lóggávu á hesum øki enn Danmark.

Eitt uppskot til løgtingslóg um forboð fyri handli við Suðurafrika og Namibia, sum innihelt reglur, sum í høvuðsheit

um samsvaraðu við ta - strongu - donsku lóggávuna, varð av Føroya landsstýri lagt fyri løgtingið tann 4. november 1986 (løgtingsmál nr. 35/1986).

Hetta lógaruppskot vann ikki frama á tingi og datt burtur við endan á tingsetuni 1986/87.

Um tað mundið, tá ið hetta uppskot varð lagt fyri løgtingið, var danska lóggávan sum nevnt munandi strangari enn lóggávan í hinum Norðurlondum, men síðan tá hava hini Norðurlondini hert sína lóggávu, so hon í dag líkist teirri donsku, seinast er Ísland komið uppí. Ísland samtykti í mai 1988 forboð fyri handli við vørum millum Ísland og Suðurafrika/ Namibia.

Føroyar standa sostatt í dag í teirri støðu at vera einasta Norðurland, ið ikki forbjóðar handli við Suðurafrika.

Landsstýrið metir, at við ti stóra denti, ið Norðurlond sum heild leggja á suðurafrikaspurningin, og við ti denti, ið Føroyar leggja á at vera við í norðurlendska felagsskapinum, er nógv, sum talar fyri at fylgja hinum Norðurlondum eftir í suðurafrikamálinum.

Til tær ymisku lógargreinirnar skal landsstýrið gera hesar viðmerkingar:

Viðv. § 1:

Bannið fevnir um innflutning av vørum og tænastum, ið hava uppruna í, og vørur og tænastur, ið eru ætlað til endaliga nýtslu í Suðurafrika ella Namibia. Ætlanin er ikki at banna handli við onnur lond í Sýðri Afrika, við vørum, sum fara igjøgnum havnir í Suðurafrikanska Lýðveldinum ella Namibia.

Viðv. § 3:

Uppskotið um at landsstýrið skal kunna geva undantakslovvi er orðað á sama hátt sum í løgtingsmáli nr. 35/1986.

Tað er greitt, at undantakslovvi eiga bert at verða givin í serstøkum førum, tá ið hetta verður mett ikki at nerva høvuðsendamálið við handilsforboðnum.

Skiftisreglurnar eru í hesum lógaruppskoti, eins og í aðrari forboðslóggávu, harímillum teimum lógum, ið hini Norðurlondini hava sett í verk, ætlaðar til tess at gava teimum, sum í áliti á ta lóggávu, ið hevur verið í gildi, áðrenn hetta uppskot er sett fram, hava gjørt handilsligar

avtalur um virksemi, ið verður forboðið, tá ið nýggja lóggávan fær gildi, rímuliga tíð at uppfylla sínar sáttmálaskyldur og at finna aðrar útvegir fyri virksemi sínum.

Tá ið talan er um sølu av fiski í Suðurafrika/Namibia frá føroyskum fiskiskipum, sum verður bannað sambært lógini, ætlar landsstýrið at heita á viðkomandi skipaeigarar um í tíðini, tá ið hetta framvegis er loyvt sambært skiftisreglunum, ikki at landa í Suðurafrika, men heldur í havnum í sjálvum Namibia.

Viðv. § 5:

Endamálið við allari lóggávu um handilsforboð er at trýsta Suðurafrikanska Lýðveldið at avtaka apartheidpolitikkin, Namibia er bert tikið við í hesi lóggávu, at tí at landið er undir suðurafrikonskum yvirræði. Nú er útlit til, at hetta yvirræði skjótt fær enda. Tí er umráðandi at landsstýrið so smidliga sum gjørligt, t.e. við kunngerð, kann sleppa Namibia undan handilsforboðnum, tá ið Namibia fær sjálvstýri. Enn vita vit tó ikki við vissu, nær tað verður. Helst verður tað beint eftir ársskiftið 1989/90.

Eitt mál, ið eigur at verða nevnt í hesum viðfangi, er havnarbýurin Walvis Bay, sum ógreiða er um. Walvis Bay liggur á namibisku strondini, men verður av suðurafrikonsku stjórnini roknaður sum partur av Suðurafrikanska Lýðveldinum.

Um so er, at Walvis Bay ikki verður partur av tí sjálvstýrda Namibia, fer avtøkan av handilsforboðnum mótvegis Namibia ikki at umfata vørur, ið uppskipaðar verða í Walvis Bay til endaliga nýtslu í hesum býi ella í Suðurafrikanska Lýðveldinum annars, men bert vørur til nýtslu í sjálvum Namibia (ella øðrum londum í Sýðra Afrika).

Í samband við, at Namibia skjótt fær sjálvstýri, ynskir landsstýrið við uppskoti til samtyktar at úttala sína nøgd við, at loysn er funnin á hesum altjóða trupulleika, sum í mong ár hevur merkt viðurskiftini í Sýðra Afrika.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/
/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 62/1989: Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.</u>

Málið er framlagt av Føroya landsstýri tann 8. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 10. februar beint í marknaðarnevndina.

Bæði uppskotini eru í lógartekstinum einsljóðandi við tí undantaki, at uppskot landsstýrisins hevur 2. stk. í § 3, ið eru skiftisreglur, ið loyva tí virksemi, ið er bannað í § 1, at halda fram til 1. mars 1990.

Uppskot landsstýrisins er so statt viðgongdari enn uppskot javnaðarfloksins. Leggjast kann aftrat, at øll grannalondini hava havt skiftisreglur í sínum lógum um handilsbann móti Suðurafrika.

Skiftisreglurnar hava til endamáls, sum nevnt í viðmerkingunum, at geva skotbrá til at enda verandi virksemi. Undantaksreglurnar hava til endamáls at taka støðu til nýggj tiltøk, sum møguliga verða søkt um at seta í verk í Suðurafrika og Namibia, meðan lógin um handilsbann er í gildi.

Marknaðarnevndin skilir skiftisreglurnar á tann hátt, at tær snúgva seg um tey trý skipini, ið nú eru í Namibia, og ikki onnur skip.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt uppskotið um handilsbann og hevur í hesum sambandi havt fund við Osmund Justinussen, reiðara, Óla Breckmann og Hildibjart Johansen, stjóra í Lønjavningargrunninum.

Sum tað skilst, so eru tað tveir føroyskir reiðarar, sum hava gjørt sáttmála um fiskiskap í Namibia. Reiðarafelagið er ikki partur í hesum.

Eitt skip hevur havt royndarveiðu í sunnara Afrika. Hesin royndarfiskiskapur er av 10. mars, so fiskar hetta skip

fyri egna rokning.

Hini bæði skipini fiska fyri egna rokning.

Eftir tí, ið kemur fram á fundinum, eru ikki onnur reiðarí, ið hava gjørt sáttmála um fiskiskap í sunnara Afrika, men møguleiki hevði verið, um áhugi var fyri tí.

Marknaðarnevndin er greið yvir, at grannalondini arbeiða um eina felagsstøðu til Namibia, tá landið er vorðið frælst, og at handilsbannið móti hesum landi verður sett úr gildi í øllum grannalondunum í senn. Hesi lond ætla eisini at hava felags støðu til Walvis Bay, um tað vísir seg, at hetta økið salsamt hoyrir til Suðurafrika, tá Namibia hevur fingið frælsi.

Tað er sannføring marknaðarnevndarinnar, at Føroyar í tráð við lógina um handilsbann eisini fylgja grannalondunum og seta lógina úr gildi samstundis sum tey, tá Namibia er vorðið frælst, og annars hava somu støðu til spurningin um Walvis Bay. Hetta merkir tó ikki, at Føroyar av sær sjálvum tekur undir við øllum tí, ið grannalondini fremja á uttanríkispolitiska økinum.

. Til kunningar løgtingsins verður skjal hjálagt, ið er stutt yvirlit yvir lógirnar um handilsbann í grannalondunum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Olaf Olsen, Svend Aage Ellefsen, Kári Kjelnæs og Lasse Klein) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

I Løgtingið biður landsstýrið heita á stjórnina í Pretoria og biðja um, at allir politiskir fangar verða leyslatnir sum skjótast.

II Løgtingið áleggur landsstýrinum at bera so í bandi, at løgtingsins marknaðarnevnd fær regluligar og støðugar fráboðanir um, hvat hendir á uttanríkispolitiska økinum í Norðurlondum.

Sama kunning verður at fara fram viðvíkjandi donskum uttanríkispolitikki, og sum Føroyar eru partar í.

Ein minniluti (Atli P. Dam) er ikki samdur við meirilutanum í, at uppskot landsstýrisins um forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia er meiri viðgongt enn uppskot Javnaðarfloksins, tí í veruleikanum útsetir uppskot landsstýrisins forboðið í eitt ár og kemur at leggja trýst á løgtingið fyri at loyva framhaldandi samvinnu við Suðurafrika.

Um uppskotini í tingmálunum nr. 61 og 62 førir minnilutin annars fram:

Tað er undir viðgerðini í marknaðarnevndini týðiliga komið til sjóndar, at virksemið hjá føroyskum skipum syðst í Afrika bert á ávísan mun er samstarv við Namibia, men higartil í nógv meira mun er samstarv við Suðurafrika, suðurafrikansk feløg og feløg í Namibia, sum suðurafrikanarar eiga og reka.

Fiskiskapurin er higartil fyri mesta partin farin fram sum roynd arfiskiskapur í suðurafrikanskum sjógvi bæði eystanfyri og vestanfyri Kap Góðu Vónarinnar.

Hesar roynd ir verða gjørdar fyri Suðurafrika og ikki Namibia, og tær verða fíggjaðar av Suðurafrika.

Ætlan landsstýrisins man vella hava verið at nýtt samstarv skuldi takast upp við Suðurafrika, sum er undir altjóða "boykotti". Samstarv hevur ikki verið við hetta land, sum hevur tað ræðuligastu skipan, kend er í heiminum, lógarfesta í stýrisskipan sini, og er tað tí bakvent at loyva slíkum samstarvi nú, serliga tá slíkt samstarv ikki skal verða loyvt aftan á 1. mars 1990.

Ja,tað tykist meiningsleyst at samtykkja eina undantaksreglu, sum loyvir at byggja upp eitt samstarv, sum skal leggjast niður aftur um 1 ár.

Menn tykjast samdir um, at tað verður torført at reka fiskiveiðu við strendur Namibiu uttan at gera nýtslu av havnini í Walvis Bay, og uttan at eisini slepst í suðurafrikanskan sjógv teir partar av árinum, tá fiskagongdin ger hetta neyðugt. Tað er eisini samlikt, at umvælingararbeiði av teknisk t framkomnum skipum má gerast í suðurafrikanskum havnum.

Tað verður sostatt torført at troyta nakað fiskiríki-

ømi við Namibiu - og fiskifrøðingar meta, at stovnarnir har, hóast ovfiskaðir í løtuni kunnu verða sera ríkir - uttan eina nærtengda samvinnu við apartheidstýrið í Suðurafrika, eisini aftan á 1. mars 1990. Løgting og landsstýri kunnu tí koma í ta støðu - verður landsstýrisuppskotið samtykt - at noyðast at gera undantaksregluna varandi og harvið loyva einum virksemi, ið er lið á ti garði, norðurlond og onnur demokratisk sinnað lond royna at gyrða um apartheidskipanina.

Støðan viðvikjandi Walvis Bay er eisini ógreið. Verður hesin býur suðurafrikanskur - og nógv bendir á, at ST noyðist at eftirlíka hesum, so er hann eisini umfataður av "generella" boykottinum av Suðurafrika, tá verður t.d. bert loyvt at landa fisk í Walvis Bay, um hesin skal nýtast í sjálvum Namibia ella onkrum av londunum innan í Afrika enn Namibia og Suðurafrika.

Rávøru til nýtslu í sjálvum Walvis Bay, til virkingar og útflutnings, ella til nýtslu í Suðurafrika, verður - um ongar undantaksreglur verða avtalaðar ímillum ST, komandi stýri í Namibia og suðurafrikansku stjórnini - sambært høvuðsreglunum, ikki loyvt at landa, slík vøra vil framvegis verða undir handilsbanni.

Tá vit vita, at nærum eitt kilo av tí, sum landað verður, kemur fólkinum í Namibiu til góðar, men verður útflutt aftur (fiskamjølið, sum brædingarvirkið í Walvis Bay er stórframleiðari av, t.d. til Onglands), so koma skip okkara framvegis í trupulleikar, tí nærum allar landingar teirra aftan á 1. mars 1990 mugu metast ólóglígar. Hvussu stórir hesir trupulleikar verða, vita vit eitki endaligt um, fyrr enn eitt nýtt stýri hevur tikið støðu til landingarloyvini.

Í løtuni eru tveir felagsskapir, sum hava altjóða viðurkenning at umboða meirilutan av namibiska fólkinum, nevniliga SWAPO (South West Africa People's Organisation) og CCN (Council of Churches in Namibia). Hesir hava báðir mælt føroyingum frá at taka upp vinnu í Namibiu, so leingi hendan byggir so nógv á samstarv við apartheidstýrið í Suðurafrika, sum talan er um, tá Suðurafrika er veruligi partnarin, meðan Namibia kemur í aðru rað.

At so er, fylgir m.a. av, at tú fært ikki innferðarloyvi til Namibiu uttan úr Pretoria.

Landsstýrið átti - ígjøgnum uttanríkisráðið ella beinleiðis - at tikið upp samrøður við hesar felagsskapir til tess at útvega stuðul teirra til føroyska samvinnu við eitt frælst og sjálvstøðugt Namibia, men mátti so sjálvsagt samstundis verið til reiðar at givið munandi styttri skotbrá - t.d. tveir til tríggjar mánaðir - at "avvikla" ta vinnu, sum enn ikki veruliga er komin í gongd.

Skiftisreglur fyri hesa vinnu 1 ár fram og undantaksreglur, sum nærum treyta varandi samstarv við apartheidstýrið í Suðurafrika, setir Føroyar í vanda fyri at verða roknað sum eitt land, ið lítur á, at tað fer at eydnast Suðurafrika at ørkymla fyrireikingarnar til frælst val í Namibia og valini sjálvi soleiðis við trýsti og "terrori", at tað kortini verða skutilsveinar apartheidstýrisins, sum koma at mynda stjórn.

Um so verður, hevur søgan lært okkum, at tað bert er stokkuta løtu, til ber at halda skutilsveinastjórnum við ræðið, um ein verulig frælsisrørsla finst. Hesar mongu, USA hevur roynt at stuðlað, t.d. í Vietnam og nú seinast USSR í Afghanistan, áttu at lært eisini "opportunistar", at valið ikki er so torført. At føroyskir reiðarar - sum teir siga í góðari trúgv og áliti til, at ongar lógarreglur forða tí - hava tikið upp samstarv, sum byggir á loyvi frá einum rasistiskum stýri, sum er lýst í bann av SÞ, er eitt mál, meðan tað politiska virksemið, ið alt hetta byggir á, er eitt heilt annað og óhugnaligari mál.

Her er eydnast einum politikara, sum hevur so serligar hugsanir um og tokka til alt, sum liggur uttanfyri ytsta høgra, at lata politisku argingar sínar í búna, sum litar málið til at líkjast menningarhjálp og hjálp til frælsisgeran av kúgaðari tjóð í ólógliga hersettum landi, samstundis sum hetta dámligara atgongumerki skal útvega føroyskari fiskivinnu hundraðtúsundtals tons av kvotu.

Veruleikin er, at hesin politikkari í ferðingarvirksemi sínum til einaræðislond í leitan eftir tilfari til láturverjavirksemi sitt fyri slík stýri, tað veri seg í Chile, á Taiwan ella Suðurafrika, longu í 1986 og 87 byrjaði fyrireikingarnar til hetta "ævintýr", sum kann gerast Føroyum dýrt. Hetta bert fyri at skapa sær høvi til at hálova útviklingínum

í apartheidstýrda Suðurafrika og máttinum í hesi búskaparskipan, sum byggir á rovdrift upp á nø kur mennisku. Væl hevur hann í kávalæti funnist at grundhugsanini í apartheidskipanini, men samstundis tað lá fyri, at geva henni grið, so hon fær stundir at minka píningina av teim svørtu, sum eiga landið.

Royndirnar higartil hava sýnt, at hetta einans hevur havt til endamáls at verja ein politikk, har høgra apartheidhond hvørja ferð tók meira aftur, enn vinstra gav. Á tann hátt skal pínan kunna dragast út nærum í óendaligheit.

Niðurstøðan má tí verða:

Nú tað er komið fram, m.a. undir viðgerðini í marknaðarnevndini - og hetta er rættiliga nýtt í kjakinum, sum mest hevur snúð seg um Namibia - at virksemið í sunnara Afrika í nógv størri mun er samvinna við apartheidstýrið í Suðurafrika enn við Namibia, og at hetta virksemið eisini framhaldandi er treytað av samvinnu við Suðurafrika, so ber ikki til at samtykkja skiftisreglur, sum røkka so langt fram í tíðini sum landsstýrisuppskotið mælir til.

Samvinna við Suðurafrika igjøgnum Namibia má treyta, at avtalur eru gjørdar landanna millum, og at hesar hava SÞ góðkenning og verða galdandi aftan á, at SÞ ætlanin er gjøgnumførd.

Mælt verður tí til at samtykkja uppskot Javnaðarflokksins og síðani millum 2. og 3. viðgerð at seta gildisdagin fyri lógina.

Minnilutin kann taka undir við uppskoti landsstýrisins til samtyktar um SÞ-ætlanina og friðaravtaluna, og kann samstundis taka undir við sjálvsøgdu uppskotum meirilutans til samtyktar um at leysiata politiskar fangar og uttanríkispolitiska kunning, men minnilutin ynskir at leggja aftur at:

Tað er royndur lutur, at suðurafrikanska hersetingin av Namibia hevur kostað namibiska fólkinum og samfelagnum dýrt. Tørvurin á humaniterari hjálp er tí stórur á so at siga øllum økjum.

Norðurlenskir hjálparfelagsskapir royna eftir førimuni og umstøðum at veita hjálp. Hendan verður mest veitt innan karmarnar av tí sankirkjuliga arbeiðinum. Ein tann munabesta

hjálpin verður veitt av Folkekirkens Nødhjælp í Danmark, og verður hendan hjálp veitt í samstarvi við namibiska kirkjuráðið CCN, ið hevur allar namibiskar kirkjur og samkomur sum limir.

Tað er Javnaðarfloksins sannføring, at Føroyar, soleiðis sum umstøðurnar eru, hava serstaka moralska ábyrgd mótvegis tí illa stadda namibiska fólkinum, og at vit tí eiga at veita hesum fólki beinleiðis humanitera hjálp her og nú.

Javnaðarflokkurin hevur umhugsað, hvussu vit best kunnu veita hjálp, og er komin til ta niðurstøðu, at skjótasta og mest effektiva hjálpin, vit kunnu veita í løtuni, er at játta Folkekirkens Nødhjælp eina upphædd at nýta í humanitera hjálpararbeiðinum í Namibia.

Fjávera og luttøka av hjálparfelagsskapum í Namibia, meðan fyrireikingarnar til nýggju støðuna eru í gongd, kunnu samstundis í ein mun ávirka, at hesar verða minni ørkimlaðar av kreftum, sum vilja ræða neyðstødd frá at luttaka í fríferingini, sum stendur teim í boði.

Javnaðarflokkurin setir tí fram fylgjandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at biðja fíggjarnevndina seta í fíggjarløgtingslógina fyri 1989 eina miljón krónur, sum verður útgoldin "Folkekirkens Nødhjælp" at nýta til humanitert hjálpararbeiði í Namibia.

Ein annar minniluti (Suni Jacobsen og Jógvan I. Olsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

MARKNAÐARNEVNDIN, 17. februar 1989.

Karin Kjølbro | Olaf Olsen | Jógvan I. Olsen

Suni Jacobsen | Kári Kjelnæs | Lasse Klein

Atli P. Dam

P.III, j.nr. 119.I.3.a

N O T I T S

Møde i den nordiske arbejdsgruppe for foranstaltninger mod Sydafrika den 10.2.1989.

Referat: Ændring af sanktionslovgivningen efter Namibias overgang til selvstændighed.

Arbejdsgruppen drøftede, hvornår det nordiske handlingsprogram (og herunder handelsforbuddet) burde sættes ud af kraft for Namibias vedkommende.

Fra dansk side nævntes, at det ikke efter gældende dansk ret ville være muligt at give dispensation fra det eksisterende handelsforbud f.eks. til levering af varer m.v. til UNTAG. En sådan adgang kunne eventuelt indarbejdes i den forudsete danske anordning til ophævelse af sanktionerne mod Namibia.

Gruppen fandt det imidlertid præmaturt på det foreliggende grundlag at fastlægge en dato for ophævelse af sanktionerne mod Namibia, når det endnu var uvist, hvornår landet ville opnå selvstændighed. Der var enighed om, at der i dette spørgsmål burde foretages nordisk koordinering samt om, at den effektive ophævelse af sanktionerne først kunne finde sted fra uafhængighedsdagen. Finland var i færd med at udarbejde en generel dispensationsadgang for leverancer til UNTAG med henblik på ikrafttræden den 1. april 1989. Sverige havde allerede indført generel dispensation for sådanne leverancer, og i norsk lovgivning forelå en administrativ dispensationsadgang fra forbuddet, som leverancer til UNTAG ville være omfattet af.

Eksport til UNTAG og til sin tid til Namibia gennem Walvis Bay ville ikke give anledning til problemer, da leverancernes endelige destination var afgørende. Walvis Bay var naturligvis omfattet af handlingsprogrammet, sålænge området var underlagt Sydafrika.

P.III, den 13. februar 1989

SØREN ELLEHOLM

Il/N-WALVIS
SK/un

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð av

tingmáli nr. 62/1988: Forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingi áleggur landsstýrinum og løgtingsins figgjarnevnd at játta hóskandi stuðul til humanitert hjálpararbeiði í Namibia, tá ið landið gerst sjálvstøðugt.

Á Føroya løgtingi, 23. februar 1989

Karin Kjølbro

Signar Kansen

Niels Pauli Danielsen

Lasse Klein

Atli P. Dam

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð av

tingmáli nr. 62/1988: Forkvð móti handli við Suðurafrika og Namibia.

Í § 3., stk. 2. verður "1. mars 1990" broytt til "1. juni 1989".	I § 3., stk. 2. ændres "1. mars 1990" til "1. juni 1989".

Á Føroya løgtingi, 23. februar 1989

Atli P. Dam

Marita Petersen

Henrik Old

Jørgen Thomsen

Vilhelm Johannesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 9 . februar 1989

F. L. j. nr. 610-9-2

Tlf. 11060 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Vágreiðsluskrivstova: Kl. 10—15. leygardag stongt

KjH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 63/1988 (Vetrarting): Broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974, nr. 33 frá 16. apríl 1986 og nr. 81 frá 14. august 1987 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 17, stk. 2 verður b) soljóðandi:
   "1. oktober - 31. januar: Lunda, lomviga og álku."
2) Í § 25 verður skoytt uppí sum stk. 5:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtinvslov nr. 27 af 9. september 1954 um fuglefangst, som ændret ved lagtingslov nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974, nr. 33 af 16. april 1986 og nr. 81 af 14. august 1987 foretages følgende ændringer:

1) I § 17, stk. 2 affattes b) således:
   "1. oktober - 31. januar: Lunde, lomvie og alke."
2) I § 25 tilføjes som stk. 5.

Landsstýrið metir, at uttan at leggja ábyrgdina á nakran fyri afturgongdina, so er rætt at geva lomvigastovninum so góðar møguleikar sum til ber at vera varðveittur til kanska liviumstøðurnar aftur batna.

Eitt samlað landsstýri skýtur ti upp, at friðingartíðin fyri lomviga, álku og lunda verður longd og ikki verður loyvt at skjóta lomviga í februar, mars og oktober, umframt mánaðirnar apríl - august, tá lomvigi, lundi og álka eru friðað eftir galdandi lóg. (Løgtingslóg nr. 81 frá 14. august 1987).

Landsstýrið hevur sum er lagt ábyrgdina av at geva loyvi til ræning til Náttúrugripasavnið. Hesa heimild fer landsstýrið at umsita, so at umsóknir um ræning verða viðgjørdar við størsta varðsemi.

Eftirlitið við friðingini verður lagt til Vaktar- og Bjargingartænastuna.

Landsstýrið umhugsar at kanna árinið av tvrluferðslu á bjargafuglin og møgulíga ásta reglur hesum viðvíkjandi.

Skipað verður fyri at kanningar av gongdini í lomvigastovninum halda áfram.

Tordur Niclasen
landsstýrismaður

/
/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 63/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 10. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 17. februar beint í umhvørvisnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir kortini til at stytta um veiðitíðina til 20. januar og setir samsvarandi hesum til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður pkt. 1) soljóðandi:

"1) Í § 17, 2. stk. verður

b) soljóðandi:

"1. oktober - 20. januar: Lunda, lomviga og álku."

I § 1 formuleres pkt. 1 således:

"1) I § 17, stk. 2 formuleres b) således:

"1. oktober - 20. januar: Lunde, lomvie og alke."

UMHVØRVISNEVNDIN, 23. februar 1989.

Poul Michelsen Marita Petersen Jóngerð Purkhús

Edmund Joensen Svend Aage Ellefsen

FØROYA LANDSSTÝRI

3800 Tórshavn 10. februar 1989

F. L. j. nr. 400
(at tilskila í svarið)

TIf. 1 1000 . Telex 81235 lings fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Skrivstovutíð: kl. 10-15. Ivsgangur sjónligt

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 64/1988 (vetrarting): Fíggjarløgtingslóg 1989.

U P P S K O T

til

broytingar í uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1989.

Tingið samtykkir uppskot fyrra landsstýrisins, framlagt 1. september 1988, til fíggjarløgtingslóg fyri árið 1989 við fylgjandi broytingum av tølunum í báðum tekstunum.

INNTØKUR	
§ 1 Skattir	
1201 Vanligur landsskattur	+ 130.000.000
§ 2 Toll- og framleiðslugjøld; skrásetingargjald	
2017 Tollgjøld	- 40.000.000
§ 6 Landsstovnar	
6009 og 6014 Tyrlutænastan og Strandfaraskip Landsins, nettoinntøka	+ 3.800.000
6003 Bygdaleiðir	+ 1.700.000
Samantalt	+ 95.500.000

ÚTREIÐSLUR

§ 10 Løgtingið — Munur

10403 Grannskoðan (intern)	- 160.000
§ 11 Landsfyrisitingin	
11053 Landsskrivstova	- 1.488.637
11307 Landsfólkayvirlit	- 55.000
11359 Almannastova	- 3.175.700
11447 Føroya Tollstova	- 799.900
11452 Føroya Gjaldstova	- 1.020.000
11257 Líkningarráð	- 2.488.000
11604 Valuta- og prísráð	- 123.500
11661 Heilsu- og heimasystrasjúkraskipanin	- 100.000
11709 Hagdeildin	- 280.000
11901 Landsverkfrøðingsskrivstova	- 1.000.000
11953 Fyrisitingarhús, í grunn	+ 5.000.000
§ 12 Heilsumál	
12012 Hjálpitólamiðstøðin	- 415.000
12109 Landssjúkrahúsið	- 8.620.000
12202 Klaksvíkar Sjúkrahús	- 2.540.000
12304 Suðuroyar Sjúkrahús	- 1.060.000
12653 Heilsu- og heimasjúkrasystraskipan	- 430.000
12755 Serlækni í geriatri	- 500.000
12756 Heilsustjóri, stovnan	+ 300.000
12907 Ymiskar útreiðslur	- 130.000
§ 13 Samferðslumál	
13001 Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum	- 2.500.000
13023 Havnagerð, í grunn	- 4.800.000
13037 Lendingar, í grunn	- 3.000.000

13042	Flogferðsla, í grunn	- 2.000.000
13061	Berghols- og brúgvagerð, í grunn	- 8.000.000
13075	Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn (viðm.)	- 500.000
13012	IRF-vegir	- 200.000
	Viðmerking til § 13.13075	
	Kommunurnar eiga kr. 115,- pr. íbúgva pr. ár seinastu fólkateljing.	
§ 14 Skúlamál		
14053	Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið	+ 653.000
14103	Fólkaskúlin	- 5.600.000
14155	HF-skeið í Suðuroy	- 208.000
14169	HF-skeið í Klaksvík	- 149.000
14174	Eysturoyar Studentaskúli og HF-skeið	- 308.000
14205	Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum	- 477.000
14397	Tekniski Skúlin í Klaksvík	- 514.000
14447	Tekniski Skúlin í Tórshavn	- 603.000
14452	Skúlaheim í Tórshavn	- 275.000
14466	Skúlaheim í Klaksvík	- 204.000
14485	Føroya Handilsskúli	+ 800.000
14604	Fritíðarundirvísing	- 1.000.000
14307	Føroya Sjómansskúli	- 717.500
14409	Klaksvíkar Sjómansskúli	- 60.000
14618	Studningur til musikkskúlar	+ 109.000
14656	Landsmiðstøð fyri undirvísingarambo	- 138.900
14675	Sjóvinnuskúli	- 200.000
14953	Ymiskir studningar	+ 8.200.000

§ 15 Vísindi, bókmentir og list

15109 Føroya Landsbókasavn	- 50.000
15202 Fólkabókasøvn	- 450.000
15304 Føroya Landsskjalasavn	- 229.600
15406 Føroya Fornminnissavn	- 525.000
15508 Bygdasøvn	- 200.000
15551 Fiskirannsóknarstova	- 500.000
15703 Føroya Náttúrugripasavn	+ 475.000
17755 Fróðskaparsetur Føroya	- 1.230.000
15805 Heilsufrøðilig Starvsstova	- 400.000
15806 Heilsufrøðiliga Starvsstovan, í grunn	+ 500.000
15907 Ymiskir studningar	+ 22.550.000
<u>§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.</u>	
16018 Vrakarastovnurin	- 280.000
16106 Nautiskt royndarkamar	- 2.000
16301 Vaktar- og bjargingartænastan	- 1.250.000
16403 Royndir innan havbúnað	- 175.000
16505 Prísásetingarnevndin fyri fisk	+ 25.000
16607 Fiskivinnuráð	- 20.000
16612 Aliráðið	- 53.000
16626 Magnus Heinason	- 370.000
16904 Aðrir studningar	+ 45.000.000
<u>§ 17 Landbúnaður og matrikulering</u>	
17015 Landsdjóralæknaembætið	- 360.000
17103 Útskifting og matrikulstova	- 800.000
17205 Royndarstøðin	- 540.000
17901 Aðrir studningar	- 250.000
<u>§ 18 Handil, iðnaður o.t.</u>	
18109 Arbeiðseftirlit	- 150.000

18114	-	í Klaksvík	- 35.570
18128	-	á Tvøroyri	- 45.160
18133	-	í Eysturoy	- 66.810
18133	-	í Vestmanna	- 50.000
18337	Læruráðið		- 103.000
18356	Ferðamannamiðstøðin		- 200.000
18361	Menningarstova		- 100.000
18365	Javnstøðunevndin		- 50.000
18907	Aðrir studningar		- 450.000
§ 19 Almannamál v.m.			
19061	Mækkingar í fólka- og avlamispensjónini		- 8.000.000
19075	Ellisheim		- 4.140.000
19089	Vistarheim fyri pensjonistar		- 405.000
19403	Vanlig forsorg		- 10.000.000
19850	Dagstovnar		- 4.740.000
19904	Ymsir studningar		- 8.260.000
§ 21 Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn			+ 60.000.000
§ 22 Aðrar og óvissar útreiðslur			
22104	Aðrar og óvissar útreiðslur		
373305 Landsstýrinum at ráða yvir			- 1.300.000
§ 27 Reguleringskonto			+ 45.000.000
Munur			+ 8.508.277

Viðmerkingar

Við tí endamáli

at styrkja føroyska búskapin,

at tálma vøkstrinum í teimum almennu rakstrarútreiðslunum,

at menna likviditet landskassans, og

at fáa virksemið í samfelagnum í eina hóskiliga og trygga legu, setti samgongan sær fyri at skerja útreiðslurnar á uppskotinum til fíggjarlóg fyri 1989, sum varð lagt fram 1. september 1988.

Tað uppskotið javnvigaði við 3.050.700.000 kr. Inntøkurnar verða nú mettar 90.000.000 kr. hægri, so at fíggjarlógin javnvigar við 3.140.700.000 kr. Sammett við fíggjarlógina fyri 1988 er talan um 13,8 % í vøkstri.

Vøksturin í landsskattinum var 15,2% í 1986, 9,6% í 1987 og 12,7% í 1988. Roknað verður við 5% í vøkstri fyri 1989.

Við einum heldur minni vøkstri í virkseminum enn undanfarin ár verður mett, at eisini tann privata nýtslan minkar nakað, og at hetta gevur 40 mió.kr. minni í tollgjøldum, enn roknað varð við í uppskotinum, sum varð lagt fram 1. september 1988.

Hóast tíðin at viðgera fíggjarlógina av nýggjum hevur verið stutt, hevur landsstýrið - eftir at hava havt samband við stovnsleiðararmar - skert útreiðslurnar, nestsum bert rakstrarútreiðslurnar, munandi, samstundis sum nakrar upphæddir eru øktar. Samlað sær úrslitið soleiðis út:

Sparingar	107.000.000 kr.
Meirútreiðslur	2.900.000 -
	104.100.000 -
Mett hægri inntøka	90.000.000 -
Til taks	194.100.000 kr.

Mett verður, at uml. 60% av útreiðslum landskassans eru fastar útreiðslur, so sum lønir, samsýningar, pensjónir, húsaútreiðslu avdráttir av lánum o.a. Av teimum 2,1 mia.kr., sum tá eru eftir at disponera yvir í tí framlagda uppskotinum til fíggjarlóg, er

sostatt spard uml. 22%.

Fyri at styrkja búskapin sum heild og serliga landskassan e stórar upphæddir settar í grunnar aftrat teimum upphæddum, sum vórðu settar á uppskotið frá 1. september 1988. Tær størstu upphæddirnar í fyriliggjandi uppskoti eru § 14 Læraraskúlin, í grunn 9 mió.kr., § 15 Sjónvarp, í grunn 8 mió.kr. og Fiskirannsóknarstova, í grunn 10 mió.kr., § 16 Upphøggingargrunnur 10 mió.kr. og Vaktarskip, í grunn 5 mió.kr og § 21 Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn 60 mió.kr.

Haraftrat eru avsettar á § 27 Reguleringskonto 45 mió.kr. o á § 16 Fiskivinna 30 mió.kr. (Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna).

Landsstýrið arbeiðir við spurninginum um stuðulin til fiskivinnuna, m.a. er ætlanin, at avreiðingarprísurin aftur í skal laga seg eftir marknaðarprísinum. Møguliga kemur landsstýrið aftur í tingið við hesum máli seinni í tingsetuni.

Sum heild kann sigast, at tær uppskotnu broytingarnar miðja ímóti at tálma teirri almennu og privatu nýtsluni og framhalda at styrkja føroyska búskapin.

Niðanfyri eru viðmerkingar til einstakar greinar, sum uppsk er um at broyta.

§ 6 Landsstovnar

ad. 6014 Strandfaraskip Landsins

Á fíggjarlógini fyri 1988 var Strandferðslan sett til - 43,8 mió.kr. umframt eykajáttan 8 mió.kr. og Tyrludeildin ti 11,5 mió.kr. ella tilsamans 63,3 mió.kr., men tað samlaða hall var 74,1 mió.kr, t.v.s. at meirnýtslan var 10,8 mió.kr.

Á tí framlagda uppskotinum til fíggjarlóg er Strandferðslan

sett til - 45 mió.kr. og Tyrludeildin til - 10,8 mió.kr. ella tilsamans - 55,8 mió.kr. Sambært nýggjari fíggjarætlan frá Strandferðsluni verður hetta minkað uml. 7% til - 51,7 mió.kr., t.v.s. at sammett við samlaða tilskotið úr landskassanum í 1988 er talan um niðurskurð uppá 30%.

Fyri at røkka hetta úrslit verða farmagjøldini hækka 10% og ferðaseðlarnir í miðal 15%. Haraftrat verður túratalið skert.

ad. 6033 Bygdaleiðir

Fíggjarlógaruppskot landsstýrisins var 24 mió.kr., sum verður skert 7% ella 1,7 mió.kr.

Av hesum verða 600.000 kr. í sambandi við ta broyttu ferðaætlanina hjá Strandferðsluni.

Haraftrat verður roknað við inntøkuhækking 10% ella 1,4 mió.kr., sum gevur eina nettomeirinntøku uppá 300.000 kr.

Harumframt er gjørligt - men talið er ikki tikið við í uppskotinum frammanfyri - at spara 1,7 mió.kr. við at selja hesar bussar uttan at nerva tænastustøðið:

2 bussar í Vágum	700.000 kr.
1 buss í Suðuroy	140.000 -
2 bussar í Norðstreymoy og Norðureysturoy	330.000 -
2 bussar í Suðureysturoy	540.000 -

Tilskilast skal, at landsstýrið veðheldur fyri 80% av lánunum í hesum bussunum, so uppsøgn (½ árs frest) kann gera veðhaldsskylduna hjá landskassanum effektiva.

<u>§ 10 Løgtingið</u>

ad. 10403 Grannskoðan (intern)

103143 Løn, starvsfólk - 150.000

213901 Ymiskar húsaútr. - 10.000

§ 11 Landsfyrisitingin

ad. 11015 Landsskrivstova

103143 Løn/starvsfólk - 250.000

103048 Løn/tænastumenn - 340.493

Eitt deildarleiðarastarv er strikað.

103168 Løn/sáttmálalønt - 248.144

Eitt fulltrúastarv er strikað.

233553 EDV-tól, keyp - 650.000

ad. 11359 Almannastova

103048 Tænastumenn + 664.50

Hetta er løn til stjóra og 2 deildarleiðarar, sum eru settir í starv.

103143 Løn, starvsfólk - 3.400.00

Frá talinum í tí framlagda uppskotinum verða nýnormeringar (2,5 mió.kr.) og óbrúktar játtanir í 1988 (11% ella 935.000 kr.) drigin.

103161 Løn, sáttmálalønt - 220.25

2 størv eru normerað, men bert annað er sett. Upphæddi er til 1 sáttmálaløntan.

233051 Innbúgv - 100.00

Av tí at nýnormeringarnar eru skornar burtur, verður ikki hildið, at tørvurin á nýggjum innbúgvi er serliga stórur.

233155 Prentlutir - 50.00

Arbeiðið við at útvega stovninum prenttilfar á føroysk um niðurfyri eigur at toyggjast, so at 200.000 kr. røkka til í 1989.

ad. 11447 Føroya Tollstova

Kontiini eru skerd 6,6%.

103048 Løn tænastumenn + 261.125

Tollstovan hevur nú so nógvar tænastumenn, sum tørvur er á.

103143 Løn, starvsfólk - 761.000

Umframt tað, sum er flutt til tænastmenn, er upphæddin skerd 500.000 kr.Orsøkin er, at øll størvini eru ikki sett og fáa tí ikki fulla lønarávirkan í 1989, og á stovninum eru 3 1. árs lærlingar.

103176 Løn, fritíðarløn - 50.000

103288 Løn, onnur - 50.000

113202 Ferða- og dagpen. innanl. - 75.000

Ferða- og dagpeningur er skerdur 75.000 kr. til 25.000 kr., sum var stovnsins upprunaliga tilmæli.

123103 Skeið - 100.000

Roknað verður ikki við, at møguleiki er at hava skeið í 1989 fyri meira enn ta avsettu upphæddina.

213901 Ymiskar húsaútreiðslur - 25.000

233259 Postgjald - 150.000

Uppskotið bygdi á postgjaldsútreiðslurnar hjá Gjaldstovuni og Tollstovuni í felag. Tað broytta talið byggir á útreiðslurnar í 1988.

233433 Nýggj tollløg og vøruskrá - 150.000

Tann avsetta upphæddin røkkur til ajourføringar o.tl. av vøruskránni.

233553 EDV-tól, keyp - 200.000

233703 EDV-tól, leiga (service) + 500.000

EDV-útbyggingin byrjaði fyri 3 árum síðani við, at

tollkredittskipanin varð avgreidd á EDV. Nú verður hildið fram at fáa tollavgreiðslu við diskin og á deildunum EDV-viðgjørda. Øll EDV-útbyggingin verður tikin undir einum.

ad. 11452 Føroya Gjaldstova

Í skrivi frá 31. januar 1989 verður sagt, at "tað við stórum sparsemi er gjørligt at lækka uppskotið við umleið 7½%" ella 1.020.200.

103405 Úrtíðarløn	- 50.000
103151 Løn, avl. og fyribilshjálp	- 33.200
213105 Hiti, ljós og vask	- 100.000
213901 Ymiskar húsaútreiðslur	- 25.000
233259 Postgjald	- 50.000
233454 Telefon, telefax	- 50.000
233409 Leiga av maskinum	- 12.000
233553 EDV	- 700.000

EVD-kontoin hjá Gjaldstovuni er mett soleiðis:

Leasing.....	960.000
Service.....	230.000
Ymist keyp og serkøn hjálp.....	400.000
EDV-pappír.....	300.000
	1.890.000
- Inntøkur.....	540.000
	1.350.000

ad. 11257 Líkningarráð

Í skrivi 1. februar 1989 sigur Líkningarráðið um niðurskurðin, at "avleiðingin av hesum verður, at ávís, arbeiði, ið ætlanin var at gera í 1989, nú mugu bíða til einaferð seinni, og at ávísar tænastur mugu falla burtur.

Lagt skal vera aftrat, at ráðið ein av fyrstu døgunum skal senda landsstýrinum frágreiðing um tey arbeiði, ið mugu støðga, til peningur verður játtaður".

103143 Løn starvsfólk	- 350.000

Tvey normerað størv á høvuðsdeildini eru strikað.

103151 Løn avloysarar	- 416.000
103405 Løn úrtíðarløn	- 227.000
113202 v.m. Skrivstovuútreiðslur	- 405.000
233553 EDV	- 1.090.025

ad. 11604 Valuta- og prísráð

Upphæddin er minkað 8% soleiðis:

103151 Løn avloysarar	- 17.500
203308 Lýsingar	- 20.000
233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur	- 65.000
Ymist	- 21.000

ad. 11661 Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin

103143 Løn, starvsfólk	- 100.000

ad. 11901 Landsverkfrøðingsskrivstova

Greinin er skerd 1 mió.kr., sum svarar til 8%.

§ 12 Heilsumál

ad. 12109 Landssjúkrahúsið

Konto 05 Húsaleiga	+ 200.000
Konto 10-26 Lønir	- 7.985.000
Konto 35 Keypa av tólum v.m.	- 963.000
Konto 36 Kostarhald	- 40.000
Konto 50 Umsiting: Hús/innbúgv v.m.	- 500.000
Konto 70 Eftirútb./tænastuferðir	- 200.000

Hesi størv eru strikað:

B1	1. hjálparlækni til psyk. deild	- 342.000
EL3	1 deildarsjúkras. til amb. bygning	- 210.000
EL4	2 sjúkras. til amb. bygning	- 192.000
N2	1 goymslufólk/hjálparfólk	- 144.000
N3	1 reingeringsfólk	- 139.000
S1	Eftirlitsass til reingerðina	- 144.000

Hesi tól eru strikað:

C2	Videoskop til endoskopideildina	- 413.000
C6	Automat. perimetur til eygnadeild.	- 500.000
M5	Sjónvarp	- 16.000
M6	Sjónband	- 9.000
M7	Sjónbandaupptakari	- 25.000

Nýggj konto 90 Nýggj ambulansutænasta + 1.000.000

1 nýgjur laborantur, sum verður settur samtært nýnormering, ska starvast uttan fyri Tórshavn (í Vágum, Sandoyrniv.m.)

ad. 12202 Klaksvíkar Sjúkrahús

Konto 10-23 Lønir - 1.000.000

Konto 50 Umsiting av húsum - 1.540.000

Í skjali 2 á síðu 95 í Fylgisskjølum til fíggjarlógina verða undir "B. Tól v.m." gjørdar hesar lækkingar í uppskoti landsstýrisins:

2.	Innbúgv til deild M	- 40.000
5.	Nýggjur telefonskiftil v.m.	+ 325.000
7.	Umbygging og umvæling av húsum við Víkav.	- 350.000
8.	Umvæling av yvirlæknahúsum	- 150.000
9.	Keyp av ognini hjá Á. Klakk	- 1.000.000

ad. 12304 Suðuroyar Sjúkrahús

Konto 10-26		- 920.000
Konto 70 Eftirútb./tænastuferðir		- 140.000
A2 1 handverkari	- 180.000	
B2 PC-ari (telda)	- 50.000	
B3 2 mobiltelefonir	- 40.000	
C2 ALB 300 ACID-BASE til lab.	- 270.000	

ad. 12653 Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin

103637 Løn, sjúkrasystrar	- 210.000
133307 Telefonendurgjald	- 20.000
253944 Sjúkrarøktartilfar	- 200.000

ad. 12907 Ymiskar útreiðslur

373305 Landsstýrinum at ráða yvir	- 100.000

§ 13 Samferðslumál

Greinin verður skerd tilsamans 21 mió.kr., sum svarar til 6,2%

ad. 13001 Nýggir vegir og brýr

Niðurskurðurin er 2,5 mió.kr. og kann ikki vera størri, um haldið ella raksturin skal vera forsvarligur. Tøkar eru nú bert 15 mió.kr, til nýgerð av vegum (kommunanna partur). Harav verða 3 mió.kr. settar av til siglingarrennu/stabbar í Haraldsundi.

ad. 13023 Havnagerð, í grunn

Niðurskurðurin er 4,8 mió.kr.. Tær 78 mió.kr. sum eftir eru, er bundnar við sáttmálum.

Skerjingin treytar og hevur við sær, at ongin havnagerð fer gongd í 1989.

ad 13037 Lendingar, í grunn

Niðurskurðurin er 3 mió.kr. Eftir eru 3 mió.kr. til nýjáttanir 1989.

ad. 13042 Flogferðsla, í grunn

Niðurskurðurin er 2 mió.kr. Peningur fer av hesi konto til flogfarahøll í Vágum. Pr. 23.1.1989 var meirnýtslan fyri 1988 8,2 mió.kr.

ad.13061 Bergbols- og brúgvagerð, í grunn

Niðurskurðurin er 8 mió.kr. Skerjingin hevur við sær, at arbeiðið heldur fram uppá tey niðan fyri nevndu bergholsarbeiðini, sum eru í gerð, við hesum upphæddum:

Vág-Lopra-Sumba.....	25 mió.kr.
Húsar-Trøllanes.....	5 mió.kr.
Grótrætt-Haraldssund-Kunoy...	5 mió.kr.
Tórshavn-Kaldbak-Signabø.....	20 mió.kr.

ad. Studningur til kommunurnar til asfaltering, í grunn

Niðurskurðurin er 500.000 kr. Skerjingin hevur við sær, at gjaldið pr. íbúgva um árið verður lækkað 35 kr. til 115 kr/-íbúgva/ár.

ad. 13012 IRF-vegir

Niðurskurðurin er 200.000 kr.

§ 14. Skúlamál

ad. 14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið

Hækkingin uppá 653.000 kr. skal nýtast at menna lærugreinina føroyskt. Lærugreinaráðgevari í føroyskum varð settur 1. august 1988. Uppgáva hansara verður at leggja til rættis pedagogikum í føroyskum. Ongin játtan kom við á tað framlagda uppskotið til fíggjarlóg.

ad. 14103 Fólkaskúlin

Møguleikarnir verða kannaðir at halda næmingatalinum í flokkunu hægri, enn tað í summum førum hevur verið, og at skipa størri valbólkar enn higartil í framhaldsskúlanum.

ad. 14307 Føroya Sjómansskúli

Skúlin avger saman við Landsskúlafyrisitingini, hvar spart verður.

ad. 14604 Frítíðarundirvísing

Við niðurskurðinum verður tað virksemið, ið er økt á hvørjum ári, tálmað nakað.

ad. 14409 Klaksvíkar Sjómansskúli

213607 Størri umbyggingar	- 50.000
253977 Eldsløkking	- 20.000
233051 Innbúgv	- 10.000
253107 Søla/kostur	+ 20.000

ad. 14155-14169-14174-14205 MF-skeiðini og Studentaskúlarnir

Skúlarnir avgera saman við Landsskúlafyrisitingini, hvar spart verður.

ad. 14397 og 14447 Teknisku Skúlarnir í Klaksvík og Tórshavn

Miðað verður ímóti at leggja útbúgvingarnar saman, sum eru á báðum skúlunum, soleiðis at sama útbúgving bert er á øðrum skúlanum. Hetta ber í sær eina sparing.

ad. 14485 Føroya Handilsskúli

Upphæddin verður hækkað av tí, at taluppsetingin í tí framlagda uppskotinum var skeiv.

ad. 14618 Studningur til musikkskúlar

Játtanin er tann sama sum í 1988, tá tølini eru regulerað.

ad. 14953 Ymiskir studningar

313152 Grunnur til útbúgving	- 2.000.000
313129 Oyggjaleikir 1989	+ 1.500.000
373305 Landsstýrinum at ráða yvir	- 300.000

Kontoin 313152 "Grunnur til útbúgving" er minkað, tí ætlanin

er at broyta lógina, sum ber sparing við sær.

313559 Læraraskúli, í grunn + 9.000.000

Farið verður undir útbygging av lærara- og venjingarskúlanum, sum landsstýrið eigur 50% av. Landskassans partur verður tí goldin, so hvørt skúlin verður bygdur.

§ 15. Vísindi, bókmentir og list

ad. 15109 Føroya landsbókasavn og 15202 Fólkabókasøvn

Kontiini eru skerd 6,8%.

213105 El, hiti og vask (Landsbókasavnið) - 50.000

523219 Bygging og nýstovnan: Í staðin fyri at seta 3 mió.kr. av sum rakstur, verða 1,8 mió.kr. lagdar í grunn.

253219 Bygging og nýstovnan (Fólkabókasøvn) - 1.200.000

Bókastova, stovnseting + 750.000

Játtanin 750.000 kr. til Bókastovu er ætlað til 1 bókavørð, 1 bókbindara, 1 hjálpartólk og 1 skrivstovufólk, sum skulu setast fyri at fremja lógina frá 9. juni 1988 um Meginbóksasvøn, Fólkabókasøvn og Skúlabókasøvn.

ad. 15304 Føroya Landsskjalasavn

Kontiini er skerd 8%.

103288 Løn - onnur - 25.000

103405 Úrtíðarløn - 6.500

113202 Ferð- og dagpen. innanl. - 6.000

213408 Umvælingar v.m. - 11.000

213816 Leiguútreiðslur - 20.000

223404 Flutningur - 5.500

233051 Innbúgv - 25.000

233728 EDV - serkøn hjálp - 10.000

253085 Bókakeyp & innb.	- 10.000
253505 Konservering	- 20.000
253521 Flyting skjalasavn v.m.	- 15.600
253562 Vísindaligar kanningar	- 50.000
253903 Aðrar útreiðslur	- 25.000

ad. 15406 Føroya Fornminnissavn

Kontiini eru skerd 7,8%. Skerjingin minkar útgrevstrararbeiðini serliga á bygd.

103288 Løn - onnur	- 300.000
213105 El, hiti og vask	- 25.000
253268 Umsiting av fornminnum	- 200.000

ad. 15508 Bygdasøvn

Kontiini eru skerd 10%.

373346 Prestagarðurin í Sandágerði	- 200.000

ad. 15703 Føroya Náttúrugripasavn

Kontiini eru skerd 6%.

103168 Løn - sáttmálalønt	- 10.000
113202 Ferða- og dagp. innanl.	- 25.000
213503 Umsiting	- 150.000
233051 Innbúgv	- 20.000
253306 Amboð	- 35.000
253396 Kanningar- og savnsarb.	- 25.000
253397 Seismiskar kanningar	+ 740.000

ad. 17755 Fróðskaparsetur Føroya

Kontiini eru skerd 6,3%. Fróðskaparsetrið vil varðveita normeringarnar, men løn til sáttmálalønt verður skorin 1 mió.kr. niður, av tí at størvini verða ikki sett í 1989 vegna langa setanarproceduru.

103168	Løn - sáttmálaløn	- 1.000.000
113538	Uttanlandsf. Fróðskapars.	- 30.000
213806	Leiguútreiðslur	- 100.000
233051	Innbúgv	- 100.000

ad. 15805 Heilsufrøðilig Starvsstova

Niðurskurðurin er 7,3%. Á fundi 27. oktober 1988 samtykti landsstýrið, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal leiga høli í nýggum húsi hjá P/F Elektron. Kostnaðurin verður 3 mió.kr., og peningur verður settur í grunn til hetta endamál.

ad. 15907 Ymiskir studningar

323364	Sjónvarp Føroya	+ 4.950.000
323307	Fiskirannsóknarstova, í grunn	+ 10.000.000

Bygging av nýggjari Fiskirannsóknarstovu er í gongd. Lántøkan lækkar tilsvarandi.

323372	Sjónvarp, í grunn	+ 8.000.000
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	- 400.000

Sjónvarp Føroya fekk í 1988 sum studning til raksturin yvir fíggjarlógina 650.000 kr., og haraftrat fekk stovnurin sum eykajáttan frá landsstýrinum og fíggjarnendini 4,8 mió.kr. Stovnurin fekk í 1988 í sjónvarpsgjaldi frá 11.217 hyggjarum 11,2 mió.kr. í studningi, men henda upphædd rekkur ikki til at reka eitt sjónvarp fyri. Sjónvarpsgjaldið fyri 1989 er ásett ti 1100 kr. og kann illa hækkast nakað av týdningi aftrat.

Á tí framlagda uppskotinum til fíggjarlóg eru aftur avsettar 650.000 kr., og stovnurin hevur tí - fyri at kunna halda somu fíggjarætlan sum í 1988 - søkt um somu upphædd aftrat, sum fekst sum eykajáttan í 1988 (4,8 mió.kr.).

Landsstýrið heldur tað vera rættari, at studningurin úr

landskassanum verður lagdur í eina fasta legu og skjýtur upp, a
ein upphædd verður sett á fíggjarlógina, sum svarar til 50% av
inntøkuni av sjónvarpsgjaldi árið fyri. Tað gevur fyri 1989 ein
upphædd uppá 5,6 mió.kr.

§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.

ad. 16018 Vrakarastovnurin

103048	Løn, tænastumenn	- 172.000
113202	Ferða- og dagpeningur	- 6.000
233051	Innbúgv	- 75.000
233259	Postgjøld	- 2.000
233354	Telefon v.m.	- 5.000
233561	Aðrar skrívstovuútr.	- 15.000
253928	Tænastuakfar v.m.	- 5.000

ad. 16904 Aðrir studningar

333017	Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna	+ 30.000.000
333025	Studn. til grunnin til endurnýggj. av fiski- og farmaskipaflotanum	
333033	Grindir	- 50.000
333058	Upphøggingargrunnur	+ 10.000.000
333074	Praktiskar fiskiroyndir, í grunn	- 1.000.000
333082	Vaktarskip, í grunn	+ 5.000.000
333199	Til upplýsing um grind	- 200.000
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	- 250.000

§ 17 Landbúnaður og matrikulering

ad. 17015 Landsdjóralæknaembætið

Kontoin er minkað úr 3.949.000 kr. í 3.589.000 kr.

103168	Løn - sáttmálaløn	- 210.000

Nýnorming minkað við einum djóralækna.

103143 Løn - starvsfólk - 90.000

½ skrivstovustarv fellur burtur.

213860 Leiguútreiðslur - 60.000

ad. 17103 Útskifting og matrikulstova

113202 Ferðapen. innanlands - 100.000

253306 Amboð, keyp, útbúnaður - 350.000

253306 IGS-útbúnaður - 250.000

253123 Tilfar, skrivstova o.a. - 100.000

IGS-útbúnaður er liður í samvinnu millum Matrikulstovuna, Landsverkfrøðingin, Telefonverkið, SEV og Tórshavnar og Klaksvíkar Kommunu um kortlegging og arbeiði við kortum. Hetta er arbeiði, sum skal gerast einaferð. Játtanin verður toygd nakað.

ad. 17205 Royndarstøðin

83809 Leiguinntøkur + 30.000

83904 Ymiskar inntøkur + 50.000

103222 Løn - reingerð - 20.000

103288 Løn - onnur - 20.000

Í játtanini eru 50.000 kr. til seyðaráðgevaran.

123103 Skeið - 15.000

233354 Telefon og telex - 20.000

233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur - 30.000

253284 Ísáðingarútreiðslur - 60.000

253491 Neytaeftirlit - 70.000

343261 Grasturking við blásara - 385.000

ad. 17901 Aðrir studningar

343079 Skógarrøkt Landsins - 200.000

373305 Landsstýrinum at ráða yvir - 50.000

§ 18 Handil, íðnaður o.t.

ad. 18109 Arbeiðseftirlit

Inntøkur stovnsins verða settar til 350.000 kr.. 130.000 kr. er settar av til bilkeyp og 150.000 kr. til ferða- og dagpening innanlands.

Inntøkurnar hjá arbeiðseftirlitinum í Klaksvík, Saltangará o á Tvøroyri verða somuleiðis hækkaðar.

ad. 18337 Læruráðið

Námsfulltrúi verður settur. Inntøkur stovnsins verða hækkaðar.

ad. 18907 Aðrir studningar

353034 At leggja í gistingahúsgrunn - 200.000

373305 Landsstýrinum at ráða yvir - 250.000

§ 19 Almannamál v.m.

ad. 19061 Hækkingar í fólka- og avlamispensjónini

Kontoin er strokin, av tí at hækkingar í pensjónum skulu roknast uppí tær føstu pensjónirnar.

ad. 19075 Ellisheim

Raksturin í Sandoynni og Norðurstreymoy verður 7,65 mió.kr. lægri enn mett, og góðkendar fíggjarætlanir fyri 1989 vísa afturímóti eina ávísa hækking. Kontoin knn tí skerast 4,1 mió.kr. niður.

ad. 19403 Vanlig forsorg

Útreiðslurnar byggja fyri ein stóran part á metingar av tørvinum. Landsstýrið arbeiðir við at gera fastari reglur, sum minka nýtsluna.

ad. 19850 Dagstovnar

Kontoin verður minkað, av tí at tað dregur út við at gera liðug

projekt liðug, og tí at onnur projekt ikki eru endaliga góðkenc
sum roknað varð við.

ad. 19904 Ymsir studningar

363382 Møðrahjálp - 200.000

363399 Kreppumiðstøð - 100.000

363573 Andveikraverndin,

føroyingar í Danmark - 1.000.000

Upphæddin verður skerd, av tí at roknskapartølini fyri 1988 vísa minni nýtslu enn mett.

363603 Styrkveiting - 200.000

363669 Feløg teirra brekaðu (at lata Meginfelagi Teirra Brekaðu at býta út) - 60.000

363685 Húsalánsgrunnur + 10.000.000

373305 Landsstýrinum at ráða - 300.000

Kontoin verður skorin niður til 100.000 kr., av tí at reglurnar fyri veitingum gjøgnum almannastovnarnar eru so rúmsáttar, at tørvurin á veitingum úr landskassanum er lítil.

FØROYA LANDSSTÝRI, 10. februar 1989

Finnbogi Ísakson

landsstýrismaður

Jalgrím Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 54/1988 (vetrarting): Fíggjarløgtingslóg 1989.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 10. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 16. februar 1989 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 1989 kemur at javnviga við kr. 3.198.348.000. Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskot landsstýrisins og hevur lagt dent á at fáa lýst lógaruppskotið so væl sum gjørligt. Har tørvur hevur verið á at lýsa ávís viðurskifti, eru upplýsingar útvegaðir, og hava landsstýrismenn, stovnsleiðarar o.a verið á fundi at greiða frá og svara spurningum í tilknýti til fíggjarlógaruppskot landsstýrisins.

Sum vant hava fundir verið við Búskaparráðið, peningastovnarnar, Føroya Fiskasølu, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag o.o. Eins og undanfarin ár varð vist á at framvegis er orsøk til at haida aftur í byggivirkseminum bæði á almenna og privata økinum og at tann yvirhitaði búskapurin er sitt vandamál.

Høvuðsvinnan hevur stórar trupulleikar og er tørvur framvegis fyri fíggjarligum stuðuli. Marknaðarviðurskiftini eru trupul vegna økta kapping og krav um hægri góðsku.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Heini O. Heinesen, Tórbjørn Poulsen og Niels Pauli Danielsen) førir fram, at samgongan, sum sat, misti meiriluta sín við valið í november 1988, og óvanliga drúgv tíð gekk, áðrenn nýtt landsstýri varð skipað.

Nýggja samgongan millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Kristiliga Fólkaflokkin, Framburðs- og Fiskivinnuflokkin hevur lýst politikk sín í alment kunngjørdari samgonguavtalu.

Sjálvstýrissamgongan ásannar, at gjaldsjavnahallið seinastu árini nú hevur akkumulerað seg til eina uttanlandsskuld sum av sonnum er verðin ein hóttan móti einum sjálvbjargnum føroyskum landsbúskapi.

Seinasta ajourførda uppgerðin av uttanlandsskuldini vísir eina samlaða skuldarbyrðu fyri samfelag okkara uppá uml. 6,7 milliardir krónur ultimo 1987, og haraftrat kemur so gjaldsjavnahallið í 1988 soleiðis, at skuldin her við ársbyrjan í ár er verðin 6,7 milliardir krónir.

Meirilutin kennir seg orkymlaðan av, at tað fyri bert fáum mánaðum síðani varð tvíhildið um eina skuldarupphædd, sum er nógv minni enn hin veruliga, og mælir landsstýrinum til at kanna, hvørt tað er neyðugt við tiltøkum til tess at tryggja at tølini frameftir alla tíðina verða tey røttu.

Givið er, at tíðindini um nýggju tølini koma at minka uppaftur meira um tað í forvegin vánaliga kreditvirðið, sum Føroyar nú eiga uttanlands. Hinvegin gerst støðan uppaftur meira hættislig, um lángevarar skulu fáa ta fatan, at landsmyndugleikarnir í Føroyum við vilja fjala yvir ella reingja figgjarstøðu landsins. Minkar enn kreditvirði okkara, so má trúvirðið ongantíð vikast!

Men hesi nýggju tølini siga okkum so mikið meira týðuligt, hvussu neyðugt tað er hjá okkum at fara hóvligari fram.

Í nýggja samgonguskjalinum verður júst undirstrikað, hvussu átrokandi tað er at fáa rættlag í ta tørvandi javnvágina á gjaldsjavnanum, og verður sligið fast "at neyðugt verður at ávirka flestu tættir í samfelagnum, sum ávirka gjaldsjavnan. Serlig herðsla má leggjast á at menna samfelagsins inntøkur og at tálma útreiðslurnar".

Fyrsta stigið í so máta hjá nýggja landsstýrinum var at fara undir eina endurskoðan av tí figgjarlógaruppskoti, sum undanfarna landsstýrið legði fram - við munandi niðurskurðum fyri eygað. Tað eydnaðist landsstýrinum í samráð við leiðslurnar á ymsum landsstovnum og fyrisitingini annars at spara góðar 107 mió. kr. á ymsum rakstrarkonti.

Í fíggjarnevndini hevur meirilutin nágreinliga gjøgnumgingið uppskotið enn einaferð, og hevur meirilutin út frá teimum samrøðum og samskifti annars, sum fíggjarnevndin undir viðgerðini havt við stovnarnar - skorið niður uppá ymsar nýtslukonti við umleið 12 mió. kr.

Samanumtikið kann tí sigast, at almenna nýtslan bert eftir einum fíggjarári verður niðurskorðin við millum 115 og 120 mió. kr. í mun til tað framlagda uppskotið. Hóast ynskjandi var, at sparingin var uppaftur størri, og hóast partar av sparda peninginum verða játtaðir til ymsar grunnar og ymisk tænastuøki, so má sigast, at her er ein fráboðan um ein nýggjan politikk í mun til tann, ið rikin hevur verið seinastu árini.

Meirilutin metir, at verður fíggjarlógaruppskotið samtykt soleiðis, sum tað nú fyriliggur, og fremur samgongan annars tær avmarkingarnar í almenna og privata íløguvirkseminum, sum fráboðaðar eru í samgonguskjalinum, so vil nýggi politikkurin medvirka til, at Føroyar framefter fóta sær fíggjarliga, og tamarhald fæst á búskaparviðurskiftunum.

Meirilutin vísir eisini á fráboðanina í samgonguskjalinum til partarnar á arbeiðsmarknaðinum um, at sitandi samgonga ikki hevur í hyggju at koma við nýggjum generellum inntøkulógum, men vil taka upp samráðingar við partarnar á arbeiðsmarknaðinum um lønarafturhald og í hesum sambandi vil viðgera møguleikarnar fyri skattalætta.

Eisini meirilutin í fíggjarnevndini kennir tað sum sína skyldu at rópa varskó í so máta. Kappingarførið hjá framleiðsluvirkjunum tolir ikki meira.

Arbeiðsmarknaðurin - bæði tann almenni og tann privati - eigur tí eisini at vita, at ein og hvør lønarhækking kemur at verða upp aftur etin við nýggjum avgjøldum og at tað tí er umráðandi heldur at fara skynsamuliga fram.

Tað er m.a. við atliti til hesi viðurskifti, at meirilutin mælir til at játta Strandfaraskipum Landsins 3,5 mió. kr. meira yvir fíggjarlógina, heldur enn at hækka farma- og ferðaseðlakostnaðin. Ein hækking av hesum gjøldum veksur um framleiðslukostnaðin hjá virkjunum og livikostnaðin annars hjá teimum, sum búgva uttanfyri meginøkið, og kundi sostatt verið medvirkandi til krøv um eina kompensatión við lønarhækkingum til fylgju.

Undir samgongusamráðingunum varð avrátt, at beinanvegin skuldi farast undir at fyrireika uppsparingarskiparnir.

Meirilutin leggur herðslu á hesa avtaluna og setir - eisini fyri at vísa tann politiska viljan hesum viðvíkjandi - fram uppskot um at hækka játtanina á grein 19-363756 "rentustudningur" í samband við uppsparing til sethúsabygging úr kr. 300.000 upp í kr. 1 mió.

Meirilutin mælir fyrisitingini til og heitir á peningastovnarnar um at gera - serliga tey ungu - meira var við fyrimunirnar í hesi uppsparingaskipan.

Undir viðgerðini er framkomið, at í fíggjarárinum 1988 eru nýttar 200 mió kr. meiri enn upprunaliga játtaðar.

Meirilutin heldur hetta verða átaluvert og er saman við landsstýrinum sinnaður at fremja tiltøk, ið skulu forða fyri slíkari endurtøku.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur í skrivi til stovnsleiðararnar gjørt vart við hesi viðurskifti og hevur eisini sagt frá tí neyðuga í, at upphæddirnar á fíggjarlógini verða yvirhildnar.

Men meirilutin mælir landsstýrinum til eisini at áleggja hvørjum einstakum stovni at gera eina ætlan, sum nágreiniliga lýsir likvitetstørvin hjá einstaka stovninum mánað fyri mánað gjøgnum árið.

Hendan ætlan kann tá verða grundarlag fyri mánaðarligu peningaávísingunum frá gjaldsstovuni, og kann samstundis verða eitt amboð fyri gjaldsstovuna og internu grannskoðanina í eftirlitsarbeiði teirra. - Frávik frá ætlanini eigur gjaldsstovan/grannskoðanin tá alt í einum at kunna fíggjarnevndina og landsstýrið um.

Slíkar likviditetsætlanir fyri stovnarnar kann eisini verða munagott amboð hjá Gjaldstovuni at stýra landskassalíkvitetinum.

Meirilutin er vorðin varður við, at peningur í einstøkum grunnum, sum er ætlaður til ávís endamál, er nýttur til annað.

Til tess at fyribyrgja framhaldi av hesum, verður í fleiri førum skotið upp, at tað skal krevjast loyvi frá fíggjarnevndini at nýta grunnfæ. Hetta ger seg t.d. galdandi í sjónvarpsgrunninum.

Annars er um grunnarnar at siga, at fleiri av teimum størri og meira týdningarmiklu verða munandi styrktir eftir fyriliggjandi uppskoti, meðan útlánsgrunnarnir fáa størri peningaupphæddir til at taka, t. d. fáa Oljugrunnurin og grunnurin til effektivar veðhaldsbindingar játtaðar 105 mió. kr. í part. Húsalánsgrunninum verða játtaðar 40 mió. kr., meðan játtanirnar til Menningargrunn Ídnaðarins og grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál verða hækkaðir til ávikavist 20 mió. og 6 mió. kr.

Stóra upphæddin til Menningargrunnin skal síggjast sum ábót móti tí versnandi kredittvirðinum. Nú útlendingar gerast trokari at lána pening til føroyskt fyritaksemi, gerst meira neyðugt við størri ískoytisjáttanum her heima. Størri føroysk sjálvsfíggjan bøtir uppá gjaldsjavnahallið - og uttanlandsskuldina -, so eisini í so máta er hækkaða játtanin ein bati.

Peningatørvurin hjá Menningargrunninum er annars nógv størri enn játtanin á løgtingsfíggjarlógini.

Tað er tí neyðugt, at landsstýrið saman við fyrisitingini av grunninum ger eina meting av tørvinum, og at tað í tí sambandinum verða givnar ábendingar um, í hvønn mun peningur grunnsins skal prioriterast til alivinnuna og/ella til ídnaðarfyritøkur og annað.

Í hesum sambandi verður eisini sipað til tann partin av samgonguskjalinum, har sagt verður, at landsstýrið og kommunurnar eiga at sjálvsfíggja sínar íløgur í størri mun enn higartil.

Í grannalondum okkara, eitt nú í Danmark verða í dag gjørd risatøk til tess at betra um almennu umsitingina, bæði fyri at veita borgarunum eitt hægri tænastustøði og fyri at spara á útreiðslusíðini. Tað er eyðsýnt, at møguleikar eru fyri at fremja tílík tiltøk, spurningurin er bert um vilja og dirvi til at fara undir hesi. Í dag er skrivstovutøknið so mikið framkomið, at tað frá einum heildarsjónarmiði má ásannast, at tað ber til at stytta um almennu samskiftisviðurskiftini og møguliga at tvinna lands- og kommunalu umsitingarnar saman við einum tøknistøði, sum er forsvarligt. Sum gongdin hevur verið í fleiri ár tykist tað verða ein megin-

regla í føroyskum umsitingarlívi, at stovnar og skrivstovur eru so at siga nýnormeraðar á hvørji fíggjarlóg umframt at verandi stovnar o.t. verða víðkað í eitt mát, sum á kostnaðarsíðuni skal rindast av einum vinnulívi við fallandi inntøkum. Tað almenna má tí síggja henda verulsika í eyguni og taka neyðug stig til at loysa hesar trupulleikarnar ógvuliga skjótt, skal ikki vinnulívið bert verða til fyri at halda lív í umsitingini.

Í álitinum frá fíggjarnevndini til fíggjarlógaruppskotið fyri 1988, varð gjørt vart við ta ógvisligu peningaupphædd, landsins stovnar árliga nýta í samband við teldútbúnaða. Eisini varð mælt til, at ávís stig vórðu tikin at minka um hesar útreiðslur, eitt nú við samskipan stovnanna ímillum. Helst orðsakað av at valskeiðið varð við at koma at enda, varð einki munagott gjørt.

Meirilutin gor tí enn einaferð vart við hesi viðurskiftini og heitir á landsstýrið um at gera nakað munagott í hesum sambandi.

Meirilutin gevur tilsøgn um, at ein umbøn úr landsstýrinum um pening til serkøna hjálp fær positiva móttøku í fíggjarnevndini.

Undanfarnu árini er talið av starvsfólki hjá tí almenna vaksið í ólukkumáta.

Úti á ymsu stovnunum, t.d. á Almannastovuni, Fróðskaparsetrinum, Tollstovuni og aðrarstaðni hava teir ikki kunna skaffað fólk til tey nógvu normeraðu størvini, hóast dugligа hevur verið lýst í bløðunum.

Tey, sum fylgja við í tí sum viðurferst í grannalondum okkara, eru kunnug við teir ovurstóru trupulleikarnar, grannarnir nú hava orsakað av eini ov stórari og ov dýrari fyrisiting.

Nýggja samgongan hevur tí beinanvegin gjørt broyting í starvsetanarpolitikkinum. Aðalreglan er at als ikki ella bert undantaksvis verða nýggj størv normerað. Karafturat verður í fleiri førum noktað stovnunum nú at seta fólk í leys, áður normerað størv.

Eisini verður enn einaferð undirstrikað, hvussu neyðugt tað er at samskipa, effektivisera og rationalisera arbeiðið á ymsu landsstovnunum.

Meirilutin hevur fleiri broytingaruppskot til broytingaruppskot landsstýrisins og ger viðmerkingar til broytingarnar í hvørjum fari.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Heini O. Heinesen, Tórbjørn Poulsen og Niels Pauli Danielsen) mælir til at samtykja uppskot landsstýrisins og setir fram hesi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 2. Toll- og framleiðslugjøld; skrásetingargjald

2017 Tollgjøld kr. 850.000.000

Viðmerking:
Sambært skriv frá Tollstovuni verður sagt, at kr. 850.000.000 er hóskandi meting við tað, at tollurin 1988 var tilsamans kr. 820.000.000.
Hækkingin er sostatt 4%.

2041 Brennuoljugjald kr. 105.000.000

Viðmerking:
Oljugjaldið gav kr. 105.000.000 í inntøku í 1988. Mett verður, at upphæddin verður hin sama í 1989.

2713/23615 Virðis- og vektargjald kr. 120.000.000

Viðmerking.
Vektargjaldið gav kr. 120.000.000 í 1988, mett verður sama upphædd fyri 1989.

Greinin verður sett til kr. 1.108.000.000

§ 6. Landsstovnar

6009 Tyrlutænastan kr. ÷ 10.800.000

6014 Strandfaraskip Landsins kr. ÷ 45.000.000

6033 Bygdaleiðir kr. + 23.700.000

Viðmerkingar:
Í staðin fyri at lækka játtanina til Strandfaraskip Landsins og Bygdaleiðir so nógv fyri síðan at seta farma- og ferðaseðlagjøldini upp, verður skotið upp at játta peningin úr landskassanum. Gjøldini hækka sostatt ikki.

Greinin verður sett til kr. - 42.059.000

§ 8. Gjaldingar frá danska statinum

8001 Heildarveiting kr. 516.179.000

Viðmerkingar:
Heildarveitingin verður sambært skriv frá Ríkisumboðsmanninum dagfest 9. februar 1989 kr. 496.000 minni enn áður mett.

8005 Afturgjald kr. 232.534.000

Viðmerkingar:
Afturgjaldingarnar innan almannaøkið o. a. verða sambært skriv frá Ríkisumboðsmanninum dagfest 9. februar 1989 kr. 18.143.000 meira enn mett.

Greinin verður sett til kr. 748.713.000

§ 10. Løgtingið

10403 Grannskoðan (íntern)
Meirjáttan til vaktarhald kr. 10.000

Greinin verður sett til kr. 15.244.000

§ 11. Landsfyrisitingin

11072 Fyrireiking av umhvørvisfyrisiting
Játtaðar verða kr. 300.000

Viðmerkingar:
Av tí, at so mikið er útliðið, verður tørvurin í ár ikki størri.

11359 Almannastova
Játtaðar verða kr. 15.747.000
Viðmerkingar:
Dupultur niðurskurður varð gjørdur orsakað av landsstýrisskiftinum.
Ongar nýnormeringar verða játtaðar fyri 1989. Tey áður normaraðu størv, ið enn ikki eru sett, verða ikki at seta í 1989.

11409 Landsskúlafyrisitingin
Játtaðar verða kr. 15.463.000
Viðmerkingar:
Psykologur og ein assistentur verða ikki jattað.
Av nýnormeringum verður bert játtað umskipan av sergreinaráðgevarastarvi úr 2/5 til 3/5 av fullaritið.

11447 Førcya Tollstova
103048 Løn tænastumonn kr. 1.800.000
103143 Løn starvsfólk kr. 4.232.000
Viðmerking:
Tvey leiðarastørv og kassameistarastarvið verða ummonnerað til tænastumannastørv.

11725 Stovnseting av landsbanka v.m.
Játtaðar verða kr. 2.000.000
Viðmerkingar:
Av tí at somikið er útliðið, verður tørvurin ikki størri. Landsbankin verður at gjalda landskassanum útlagda peningin aftur.

Greinin verður sett til kr. 157.107.000

§ 12. Heilsumál
12012 Hjálpitólamiðstøð
Játtaðar verða kr. 3.535.000
Viðmerking:
Av nýnormeringum fyri 1989 verður bert játtað eitt hálvt reingerðingarfólk.
Til EDV keyp og - nýtslu, verða játtaðar kr. 320.000.

12109 Landssjúkrahúsið (D.A.H.)
Játtaðar verða kr. 244.151.000

12202 Klaksvíkar sjúkrahús
Játtaðar verða kr. 44.803.000

12304 Suðuroyar sjúkrahús
Játtaðar verða kr. 27.080.00
Viðmerking:
Broytingarnar eru orsakaðar av prentvillu í broytingaruppskoti landsstýrisins

Nýggj konto
12756 Heilsustjóri, stovnan kr. 300.000
Viðmerking:
Reglugerð og yvirlit yvir bygnað fyri heilsustjóra verður at leggja fyri fíggjarnevndina til góðkenningar, áðrenn starv verður sett.

12907-303115 Tubbaksráð
Kontoin broytir navn til: Tubbaksráð/Rúsevnisráð

12907-373305 Landsstýrinum at ráða yvir
Játtaðar verða kr. 100.000

Greinin verður sett til kr. 400.505.000

§ 13. Samferðslumál
13001 Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum
Játtaðar verða kr. 116.500.000
Skjal viðlagt.

13037 Lendingar, í grunn
Játtaðar verða kr. 26.000.000
Viðmerkingar:
Til nýjáttanir 1989 verða sosatt kr. 3.000.000.

13061 Bergnóls- og brúgvagerð, í grunn
Játtaðar verða kr. 61.000.000

Viðmerkingar:

Peningurin verður settur av til hesi arbeiði:

Vág-Lopra-Sumba	kr. 25.000.000
Trøllanes-Húsar-Syðradalur	kr. 5.000.000
Grótrætt-Haraldsund-Kunoy	kr. 5.000.000
Tórshavn-Kaldbak-Signabø	kr. 20.000.000
At byrja bergnólsgerð til Gásadals	kr. 3.000.000
Stabbar, dekkgrót, siglingarrennu Haraldssund	kr. 3.000.000
	kr. 61.000.000

Viðvíkjandi uppræddunum til Gásadalsbergnólið og siglingarrennu um Haraldssund er at siga, at hesi arbeiðini skulu byrjast nú, men annars tryggjast yvir tað áramál, sum búskaparstøða landsins krevur og skipast inn í ta fløgu- og ráðfestingarætlan, sum gerast skal innan 1. mai 1989.

Annars er sundurgreining til tær einstøku vegagerðirnar og uppbýti viðlagt í skjali.

13106 Byggigrunnur Strandferðslunnar
Kontoin verður sett til kr. 0

13111 Millumbylgjustøð
Kontoin verður sett til kr. 0

Greinin verður sett til kr. 319.300.000

§ 14. Skúlamál

14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið
Játtaðar verða kr. 2.243.000

Viðmerking:

Landsskúlafyrisitingin sparir sjálv á undirkonti.

14307 Førcya Sjómansskúli
Játtaðar verða kr. 6.525.000
Viðmerkingar:
Orsøkin til broytingina er feilur í broytingaruppskoti landsstýrisins.

14397 Tekniski skúlin í Klaksvík
Játtaðar verða kr. 4.557.000
Viðmerkingar:
Viðmerkingar landsstýrisins viðvíkjandi 14397 og 14447 um at leggja útbúgvingarnar saman falla burtur.

14414 Føroya Maskinskúli
Játtaðar verða kr. 8.116.000
Viðmerking:
Játtaður verður ein lærari til el-deildina og kr. 70.000 til eyka húsaleigu afturat.

14471 Útgerð til tekniskar skúlar
Játtaðar verða kr. 3.500.000
Viðmerking:
Peningur til tól til dagføring av lesiætlanum verður játtaður yvir fíggjarlógirnar 1988, 1989 og 1990.

14485 Føroya Handilsskúli
Játtaðar verða kr. 12.000.000
Viðmerking:
Handilsskúlin disponerar meirjáttanina.

14618 Stuðningur til musikkskúlar
Játtaðar verða kr. 4.200.000
Viðmerking:
Normering av skrivara til musikkskúlaleiðara verður ikki játtað.

14656 Landsmiðstøð fyri undirvísingarambcð
Upphæddin verður óbroytt.
Viðmerking:
Tvey hjálparfólk verða ikki játtað.

14661 Kontoin broytir navn: Skúli fyri fiskiídnað og havbúnað í Norðurstreymoy.
Játtaðar verða kr. 1.800.000
Fyribils verður bert hesin eini skúlin stovnsettur.

14675 Sjóvinnuskúli
Játtaðar verða kr. 1.200.000
Viðmerking:
Skúlin byrjar neyvan fyrr enn til heystar, so tørvur verður ikki á meira peningi.
Orsakað av at sjóvinnuskúlin, sum sambært løgtingslóg skal byggjast í Nevi, ikki verður liðugur í skúlaárinum, verður nýtsla av játtanini at góðkennast av fíggjarnevndini.

14901-313128 Studningur til ÍSF
Játtaðar verða kr. 3.600.000
Herav til venjarar hjá FSF kr. 300.000
Hildið verður fast við uppskotið um at játta kr. 1.500.000 til byggjaleikirnar.

14953-313302 Ítróttar- og skúlabyggigrunnur (viðm.).

14953-313319 Sjómannskúli, í grunn (viðm).

14953-313335 Studentaskúli í Hoydølum, í grunn (viðm.)

14953-313343 Aðrir stud.- og HF-skúlar, í grunn (viðm).

14953-313439 Kontoin broytir navn:
Læruráðnum at ráða yvir: Eftirútbúgving av yrkislærdum.

14953-313559 Læraraskúli, í grunn (viðm).

14953-313567 Maskinskúli, í grunn (viðm).

14953-313575 Kontoin broytir navn:
Tekniskir skúlar í grunn (viðm).

14953-313583 Sjóvinnuskúli. Í grunn (viðm).

14953-313591 Fiskiíðnaðarskúli. Í grunn (viðm).

14953-373305 Landsstýrinum at ráða yvir
Játtaðar verða kr. 250.000

Greinin verður sett til kr. 422.470.000

§ 15. Vísindi, bókmentir og list

15202 Fólkabókasøvn (viðm.)
Játtaðar verða kr. 7.966.000
Viðmerking:
Stuðul til nýbygging av bókasøvnum verður lagdur í grunn á nýggjari konto.

15508 Bygdasøvn
Játtaðar verða kr. 2.002.000
Viðmerking:
Eisini Sørvágs bygdasavn fær kr. 25.000

155551 Fiskirannsóknarstovan
Ongar nýnormeringar verða játtaðar.

15755 Fróðskaparsetur Føroya
Av nýnormeringum í 1989 verður bert játtaður "Orðabókastjóri".

15907-323037 Sjónleikur
Viðmerkingar:
Áðrenn peningur verður útgoldin til Leikpall Føroya, má yvirlit yvir bygnaða, reglugerð v.m. verða góðkend av fíggjarnevnd løgtingsins.

15907-323086 Sømdarpeningur til skald
og listamenn (viðm.)
Játtaðar verða kr. 225.000

15907-323132 Sjónleikarhús. Í grunn (viðm).

15907-323149 Fornminnissavn. Í grunn (viðm.).

15907-323181 Ungdóms- og bygdahús, í grunn (viðm).
Játtaðar veroa kr. 4.000.000
Viðmerking:
Grunnurin er negativur og tørvur er á peninginum.

15907-323244 Savn í Hoyvík, í grunn (viðm.).

Nýggj konto: Bókasøvn, nýstovnan, í grunn
Játtaðar veroa kr. 2.000.000

15907-323331 Útvarp Føroya, tilskot til
avdráttir av lánum
Viðmerking:
Helvtin av upphæddini kr. 4.000.000 verður at nýta til niðurrindan av landskassaútleggum.

15907-323348 Skjalasavn, í grunn (viðm.).

15907-323364 Sjónvarp Førcya
Játtaðar veroa kr. 4.800.000
Viðmerking:
Av játtaðu upphæddini skulu í minsta lagi nýtast kr. 200.000 til at teksta føroyskar sendingar fyri deyvum sýggjarum.

15907-323372 Sjónvarp, í grunn (viðm.).
játtaðar veroa kr. 8.000.000

15907-323468 Náttúrugripasavn, í grunn (viðm.).

15907-323476 Fróðskaparsetrið, í grunn (viðm.).

15907-323305 Landsstýrinum at ráða yvir
Játtaðar veroa kr. 250.000

Greinin verður sett til kr. 123.143.000

§ 16. Fiskivinna, sigling o.t.

16626 "Magnus Heinason"

Játtaðar verða kr. 9.500.000

Viðmerking:

Meirjáttan uppá kr. 500.000 er neyðug um "Magnus Heinason" bert skal gera roynðir og ikki verða rikin vinnuliga sum ísfiskaskip part av árinum.

16904-333082 Vaktarskip, í grunn (viðm.).

Játtaðar verða kr. 9.500.000

Nýggj konto: Limagjald til fleirtjóðafelagsskapir

Játtaðar verða kr. 418.000

16904-373305 Landsstýrinum at ráða yvir

Játtaðar verða kr. 150.000

Greinin verður sett til kr. 423.584.000

§ 17. Landbúnaður og matrikulering

17015 Landsdjóralæknaembætið

Játtaðar verða kr. 3.799.000

Viðmerking:

Normerað verður nýtt djóralæknastarv í fiskasjúkum, treytað av, at Havbúnaðarfelagið leggur út fyri eitt starv.

Nýggj konto: Bjargarækt

Játtaðar verða kr. 250.000

17901-373305 Landsstýrinum at ráða yvir

Játtaðar verða kr. 100.000

Greinin verður sett til kr. 51.079.000

§ 18. Handil, iðnaður o.t.

18907-353026 Stuðul til iðnaðarfremjandi endamál, í grunn (viðm.)
Játtaðar verða kr. 6.000.000

18907-353042 Til menningargrunn iðnaðarins
Játtaðar verða kr. 20.000.000

18907-353146 Nýggj grein: Ferðaendurgjald til læruplass
Játtaðar verða kr. 400.000

Viðmerkingar:
Hetta er peningur, ið verður endurgoldin teimum, sð ikki kunnu fáa tekniska skúlagongd í Føroyum.

18907-373305 Landsstýrinum at ráða yvir
Játtaðar verða kr. 150.000

Greinin verður sett til kr. 50.016.000

§ 19. Almannamál v.m.

19904-363287 Vardar íbúðir til pensionistar í grunn (viðm.).
Játtaðar verða kr. 4.000.000

19904-363565 Blindaheimið
Játtaðar verða kr. 1.200.000

19904-363603 Styrkveiting
Játtaðar verða kr. 150.000

19904-363707 Arbeiðsloysisgrunnur arbeiðarafelaganna
Játtaðar verða kr. 800.000

19904-363731 Ansingar- og røktarheim, í grunn (viðm.).

19904-363748 Íbúðagrunnur (viðm).
Játtaðar verða kr. 2.000.000

Viðmerking:
Grunnurin eigur munandi uppheddir.

19904-363757 Rentustuðningur til húsabygging
Játtaðar verða kr. 1.000.000

Viðmerking:
Nýtslan av hesi konto var í 1987 kr. 758.800. Vónandi veksur uppsparingin, og tá økist nýtslan.

19904-363777 Næmingaheim, í grunn (viðm.).

19904-373305 Landsstýrinum at ráða yvir
Játtaðar verða kr. 200.000

19918 Skúlin á Tróni
Játtaðar verða kr. 16.550.000

Viðmerking:
Játtað verður nýtt starv sum teknikari til hoyritól. Hjálp til hoyri- og talubrekað ferð fram við Skúlan á Tróni, har slík frálæra eisini verður givin.

Greinin verður sett til kr. 820.799.000

§ 21. Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn
21019 Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn
Játtaðar verða kr. 105.000.000

Greinin verður sett til kr. 105.000.000

§ 23. At leggja í ymsar grunnar v.m.
23203-383168 Oljugrunnur
Játtaðar verða kr. 105.000.000

Greinin verður sett til kr. 145.741.000

§ 27. Reguleringskonto
27305 Reguleringskonto
Játtaðar verða kr. 50.000.000

Greinin verður sett til kr. 50.000.000

Minnilutin Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen vísir á, at nýskipaða landsstýrissamgongan legði til brots við tí endamáli, at sparast skulu 200.000.000 kr. á tí løgtingsfíggjarlóg, sum undanfarna landsstýrið legði fram á ting 1. september 1988 (løgtingsmál nr. 12/1988). Hetta uppskot javnvigaði við 3.050.701.000 kr.

Í mun til fíggjarlógina fyri 1988, sum javnvigaði við 2.834.135.000 kr., var hetta ein vøkstur uppá 7,1%. Men í mun til tey útreiðslutøl, sum lógu á bordinum, tá undanfarna landsstýrið fór undir viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum, er talan um ein niðurskurð uppá umleið 550.000.000 kr. ella 15,3%.

Tað samalaða útreiðslutalið var meira enn 3.600.000.000 kr. Hendan upphædd umfataði pening at seta í grunnar, pening til rentur og avdrøg, til burturleggingar og tey mongu ynskini frá teim ymisku stovnunum. Men við sínum sparipolitikki megnaði undanfarna landsstýri at skerja hesa upphædd við 15,3 % niður í 3.050.701.000 kr.

Í samband við hesa sparing royndi fráfarna landsstýrið undir leiðslu javnaðarfloksins í størst møguligan mun at sleppa almannaverkinum, heilsuverkinum, útbúgvingarstovnunum og útjaðaraøkjunum undan størri niðurskurðum. Javnaðarflokkurin heldur tað vera skeivt, at sparitiltøk skulu raka hesi.

Sum áður nevnt legði nývalda landsstýrið til brots við einum sparipolitikki. Tann 10. februar kom so úrslitið fram á ting. Hetta var fíggjarlógaruppskotið hjá seinasta landsstýri í broyttum líki, so at tað nú javnvigar við 3.140.701.000 kr. ella eini hækking uppá 90.000.000 kr.

Minnilutin kann ikki taka undir við teimum metingum, sum nýggja landsstýrið hevur gjørt viðvíkjandi inntøkum landskassans í 1989. Sitandi landsstýrið hevur mett skattainntøkuna 130.000.000 kr. hægri enn undanfarna landsstýrið gjørdi. Tollgjøldini eru mett at geva 40.000.000 kr. minni.

Í fjør og eisini árini frammanundan, hevur óvaniliga mógv virksemi verið her á landi. Men her tykist vend at vera komin í nú, afturat tí, at báðar teir fyrstu mánaðarnar í ár

er nærum ongin fiskur komin uppá land og tí hevur nærum einki arbeiði verið á flakavirkjunum heldur.

Taka vit skattainntøkurnar, so má havast í huga, at samgongan hevur sett sær fyri, at alt virksemið skal tálmast uppaftur meira. Hetta førir sjálvandi aftur við sær, at vøksturin í skattainntøkunum verður minni enn, hann annars vildi verið. Tá vit skulu ætla um inntøkumøguleikarnar hjá tí almenna, er støðan og gongdin hjá fiskivinnuni ein týðandi spurningur.

Langfarafiskiskapurin gevur tiverri munandi minni enn áður. Hetta er galdnadi bæði vestan- og eystanfyri. Orsakað av ti ringa veðurlagnum higartil í ár, er lítið komið burtur úr hjá útróðrabátum og feskfiskaskipum. Sum nevnt, hevur arbeiðsfólkið í fiskiídnaðinum og onnur við eisini kent sviðan av hesum.

Men hóast hetta sýnir eitt yvirlit frá líkningarráðnum, at teir báðar fyrstu mánaðarnar í ár, er talan um ein vøkstur í skattainntøkuni uppá 7,6%, um báðir mánaðarnir verða tiknir undir einum. Í januar er ein vøkstur uppá 10%. Í februar ein minking uppá 2,8 %.

Minnilutin roknar við, at vøksturin í januar 1989 stavar frá hýrum, sum eru vunnar í december 1988 og fyrr, men hesar eru ikki avroknaðar og útgoldnar fyrr enn í januar 1989 og harvið hava hesar ávirkað tølini hjá líkningarráðnum.

Vit halda tað vera burtur við at vænta, at fólk skulu vinna stórt meira enn 7% í hægri inntøku í ár, enn í fjør. Í uppskotinum hjá undanfarna landsstýri eru inntøkurnar hækkaðar við góðum 7% í mun til inntøkurnar í 1988. Minnilutin kann ikki takað undir við at hækka skattainntøkurnar á fíggjarlógini í tann mun, sum nýggja landsstýrið hevur mæit til.

Umboðini fyri javnarðarflokkin halda ikki, at nývalda landsstýrið hevur verið serliga heppið við sínum skerjingum á fíggjarlógini, sum í flestu førum einans er ein flyting, ið neyvan førir nevniverda sparing við sær.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini hava umboð javnaðarfloksins onga trygd fingið fyri, at tær flytingar, sum gjørdar oru á fíggjarlógini ikki koma at nerva hesi øki:

1. Fólkaskúlin
2. Heilsuverkið
3. Almannaverkið
4. Útjaðaraøkini

Undir nevndarviðgerðini varð týðuliga sagt, at mest sum øll nýgerð av koyrivegum verður steðgað orskað av teimum niðurskuðrum, ið framdir eru á hesi játtan. Serliga í útjaðraøkjunum vil hetta føra eitt ávist arbeiðsloysi við sær.

Á síðu 118 í fylgiskjølunum verður víst á, hvørjar vegir ætlanin var at gera. Nærum allar hesar vegagerðir verða nú lagdar stillar. Okkurt av hesum arbeiðsplássum verður kortini varðveitt av tí, at arbeiðssáttmáli frammanundan er gjørdur um hesi arbeiðir. Hetta eru vegagerðir, sum í fleiri ár hava gingið í hesum byggjum og millum hesar bygdir:

Vág - Lopra
Trongisvág - Øravík
Vegagerð í Sandoynni
Miðvág - Vatnsoyrar
Syðradalsvegurin
Tórshavn - Kirkjubø
Eiðisvegurin
Funningsvegurin
Skipanesvegurin
Stendur - Skúla
Rituvíkarvegurin
Mýruvegurin í Rituvík
Klaksvík - Norðoyri
Húsar - Syðradalur
Múlavegurin og
Kirkja - Hattarvík

Eisini eru vit vitandi um, at arbeiðið í berghølunum á Borðoynni er steðgað og at fólkið er sent til hús. Hetta var eitt átrokandi neyðugt arbeiði fyri at bøta um viðurskiftini

í hesum tunnlum. Alt hetta eru dømir um, at milliónirnar verða fluttar frá útjaðaraøkjunum til onnur økir.

Sum øllum kunnugt er byggivirksemið enn rættiliga stórt í miðstaðarøkinum, meðan tað er rættiliga lítið úti um landið. Hesar trupulleikar ger nýggja landsstýrið eitki við í fíggjarlógaruppskoti sínum. Undanfarna landsstýrið mælti í sínum fíggjarlógaruppskoti til at seta 1.000.000 kr. í grunn til útbygging av Føroya læraskúla. Nýggja landsstýrið hevur skotið upp, at 9.000.000 kr. verða nýttar í hesum fíggjarári til nevndna endamál. Umboð javnaðarfloksins eru kunnug við, at hølisviðurskiftini eru vánalig, men eru tó av tí áskoðan, at hetta arbeiði kundi bíða og peningur verða settur í grunn yvir nøkur ár, av tí at byggivirksemið - serliga tað privata er sera stórt í økinum enn.

Tá undafarna landsstýrið legði fíggjarlógaruppskotið fram, varð víst á í viðmerkingunum, at sosialar lógir eru samtyktar í tinginum, sum krevja pening. Í hesum sambandi verður sagt: "At bøta um viðurskiftni á almannaøkinum, og her eru lógir samtyktar um hægri pensión, longri barnsburðarfrí, barnastyrk o.s.fr., somuleiðis eru lunnar lagdir undir fleiri smá heim eins og framvegis hevur verið arbeitt við at betra røktar- og ansingarheim".

Játtanirnar undir § 19, sum skulu bera kostnaðin av hesum sosialu lógum, eru skerdar so munandi, at minnilutin kennir seg sannførdan um, at her verður ov lítið av peningi og mælir tinginum til at taka undir við upprunauppskoti landsstýrisins við teimum broytingum, sum vit mæla til í hesum áliti.

Í løgtingsmáli nr. 134/1986 samtykti løgtingið lógina um barnastyrk. Sambært lógina (lóg nr. 50 frá 5. mai 1987) verður barnastyrkur útgoldin eina ferð um fjórðingsárið til børn millum 1/2 og 3 ár, millum 3 og 7 ár og millum 7 og 16 ár við ávikavist 2.200 kr., 1.400 kr. og 1.200 kr.

Eftir 1. viðgerð varð hetta mál beint í Almanna- og heilsunevndina. Tað var ein samd nevnd, sum tók undir við uppskotinum frá landstýrinum, og mælti løgtinginum til at samtykkja hetta. Lógaruppskotið varð samtykt við 28 atkvøðum

fyri og ongari ímóti. Sostatt var breið undirtøka fyri hesum máli á tingi. Eisini fyri reglunum í § 3 um, at barnastyrkurin skuldi vera inntøkujavnaður, soleiðis at hann serliga kom smá- og miðalinntøkunum til góðar.

Hálvt ár seinni mælti landsstýrið løgtinginum til at samtykkja ymiskar tekniskar broytingar í lógini um barnastyrk (løgtingsmál nr. 39/1987). Aftur hesa ferð varð málið beint í Almanna- og heilsunevndina. Undir viðgerðini í nevndini kom ein minniluti við uppskoti um at strika § 3 í lógini soleiðis, at øll uttan mun til inntøku fingu sama barnastyrk. Hetta varð samtykt við 17 atkvøðum.

Javnaðarflokkurin heldur tað vera órættvist, at fólk við stórum inntøkum skulu fáa sama barnastyrk sum smá- og miðalinntøkurnar. Minnilutin roknar við, at hetta kostar landskassanum umleið 12.000.000 kr. um árið. Hesin peningur kundi og átti at verið spardur og seta umboð javnaðarfloksins fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

"Løgtingið áleggur landsstýrinum at javnføra reglurnar um inntøkujavning og at leggja fyri løgtingið uppskot um at seta § 3 í upprunalógini um barnastyrk aftur í gildið".

Undir viðgerðini hevur minniluti skotið upp hesar broytingar:

1. § 1 Skattir:
   1201: Vanligur landsskattur verður hækkaður við kr. 14.586.000
   Greinin er sett til 1.576.600.000 kr.

2. § 2 Toll- og framleiðslugjøld; skrásetingargjald:
   2041: Oljuavgjald + 35.000.000 kr. Greinin er sett til 1.143.000 kr.

3. § 8 Gjaldingar frá danska statinum:
   8001: Heildarveitingar + 496.000 kr.
   8005: Afturgjald + 18.134.000 kr.
   Greini er sett til 748.713.000 kr.

4. § 16 Fiskivinna, sigling o.t.:
   16904/33307: Mixstuløn og annar stuðul til fiskivinnuna + 30.000.000 kr.
   Greinin er sett til 411.691.000 kr.

5. § 17 Landbúnaður og matrikulering:
   17015: Fiskasjúkudjóralækni + 210.000 kr.
   Greinin er sett til 3.799.00 kr.

6. § 19 Almannamál v.m.:
   19904/363524: Barnastyrkur + 12.000.000 kr.
   363707: Arbeidisloysinggrunnur + 2.500.000 kr.
   363756: Rentustudningur til sethúsabygging + 700.000 kr.
   greini sett til 818.662.000 kr.

7. § 23 At leggja í ymsar grunnar v.m.:
   Oljugrunnur + 35.000.000 kr.
   Greinin er sett til 140.741.000 kr.

8. § 23 At seta á reguleringskonto 10.814.000 kr.

Við hesum broytingum javnvigar fíggjarlógaruppskotið, ið varð framlagt 1. september 1988 við:

Inntøkur:	Útreiðslur:
3.075.566.000kr.	3.075.566.000 kr.

Løgtingsfíggjarlógin er eitt týdningarmikið búskaparligt amboð, men ávirkan hennara á samfelagsraksturin og búskapargongdin verður munandi skerd so leingi, tað ikki er møguligt at samskipa ætlanirnar við fíggjarlógini við annað alment og privat virksemi.

Javnaðarflokkurin hevur í øllum sínum politikki miðað í móti at fáa framt slíkar lóggávur, sum geva amboð til at

fremja neyvt eftirlit við privata búskaparvirkseminum og samskipa privat, kommunalt og alment virksemi.

Landsbankin og heimildir hans eru framstig, men hesar heimildir eru ikki nóg rúmar. Tað hevur gongdin seinastu 10 - 15 árini sannført um, tí íløguvirksemið hevur als ikki verið undir nóg strangari stýring.

Tað er rokkið nakað ávegis við samráðingum og í løtuni kunnu slíkar muna eitt sindur afturat, men møguleikin fyri at kunna nýtt meiri víttgangandi heimildir hevði helst gjørt slíkar samráðingar fruktabetri.

Í nógv ár hevur samlaða íløguvirksemið verið einar 3 - 400 mió. kr. ov stórt um árið, og hetta hóast tað almenna ferð eftir ferð hevur verið noytt at útseta íløgur, tí tær privatu lógu á so høgum stigi.

Samskipan í millum politikk landsstýrisins og bankanna er í løtuni tað týdningarmesta. Bankarnir hava nú í nøkur ár heldur enn ikki birt uppundir eldin, tá tað snýr seg um uttanlandslántøku, so sum vøksturin í umsetningi - innskoti og útláni - sýna. Tað er greitt at hetta hevur økt samlaða virksemið óforsvarliga nógv. Serligan skaða hava slík lán gjørt, sum bert verða sett á bók í Føroyum, av tí at veruligur lánitørvur ikki er hjá lántakaranum. Hesin fer dupultan fyrimun av rentuskattaskipan okkara, meðan tað svíir aftur til tann vanliga skattgjaldaran, harumframt fáa peningastovnarnir ein likivitet, sum teir skulu sleppa sær av aftur við. Í tann mun hetta ikki verður við virðisbrævakeypi uttanlands, má peningurin lænast út í Føroyum og tá skapar hann slíkt trýst á virksemið og búskaparskipanina, at uttanlandsskuldin veksur heilt ónayðuga nógv.

Ársfrágreiðingar peningastovnanna hetta glæsiligasta ár teirra týða uppá at teir nú ætla at takað annað skinn um bak, men javnaðarflokkurin heldur, at bindandi avtalur ella nýggj lóggáva máa fáast til vega so hetta ikki endurtekur seg, so skjótt virksemið linkar. Tað er linkað nakað og tí mugu vit ansa eftir, at fíggjarlóg løgtingsins er so sterk og konsoliderað, at tiltøk kunnu fremjast sum forða fyri, at vit draga upp á okkum arbeiðsloysi, tí slík støða er hin ringasta, vit kunnu koma í.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) førir fram:

Fyri tveimum árum síðani fingu vit at vita, at uppskotið til fíggjarløgtingslógina tá, var tað fyrsta, har blokkurin var innroknaður, og at hetta førdi við sær, at tað komu nógv nýggj rakstrarstøð innan skúla-, heilsu- og almannaverkið, t.v.s., vit fingu fleiri og størri uppgávur at reka og røkja, vit fingu eina nógv dýrari umsiting.

Í fjør segði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, tá uppskot til fíggjarlógina varð lagt fram, at nú var sterkur karmur lagdur um eitt sanskipað virksemi fyri árið 1989, og at fyrst nú sást, hvat føroyska samfelagið kostar at reka.

Tað kundi ljóðað sum um undanfarna landsstýrið og fleiri ikki hava varnast, hvat føroyska húsarhaldið kostar fyrr enn nú, blokkstuðulin er komin við á fíggjarlógina.

Hetta hava onnur vitað, og tey vita eisini, hvat ið skal bera samfelagið víðari. Stovnsleiðarar og annað gott fólk verða nærmast løgd undir at oyðsla við almennum peningi, meðan samgongan, uttan at rodna, vaskar sínar hendur í sparitiltøkum, sum als engin sparing liggur í, bert ein bráfeingis niðurskurður.

Landskassans útreiðslur, fyri at hava alt koyrandi, verða mettar til umleið 3 mia.kr., meðan inntøkur verða mettar munin hægri soleiðis, at tað vigar nøkulunda upp í móti hvørjum øðrum, eitt lítið avlop á pappirinum.

Vanliga verður hildið, at tað stendur hampuliga væl til, og sagt verður í tíð og ótíð, at vit klára at gjalda hvørjum sítt o.s.fr.

Taka vit "familjuna" Føroyar sum heild, er støðan ein onnur. Fyribils tøl siga okkum, at í 1988 hevdu vit ein ójavna, eitt risahall upp á 1.631.000.000 kr. millum samlaðu inntøkurnar og samlaðu útreiðslurnar.

Var tjóðveldið sett á stovn, hevði hesin ójavnin verið enn størri skeiva vegin, og tá hevði Finnbogi Ísakson havt alla orsøk at flotta sær í Norðurlandaráðnum og sent okkum "rokningina" heim.

Men "olmussan" kemur okkum til hjálpar og hálar okkara risahall eina heila milliard niður soleiðis, at vit sita eftir við einum nettohalli fyri árið 1988 upp á umleið 700 mió.kr., tá avtornar.

Siggja vit fíggjarlógina í mun til okkara framleiðslu alla í mun til okkara útflutningsvirði, eru vit farnir út um alt mark, hvat ekonomii viðvíkur. Eitt syrgiligt facitt fyri tey, ið enn hava mót upp á sokallaða tjóðarfrælsið og fíggjarligt sjálvbjargni.

Fyri at lýsa hesa óhugnaligu gongd skulu vit aftur til 1974, tá Atli Dam setti fær fyri at halda Sambandsflokkin uttan fyri alla politiska ávirkan. Sambandsflokkurin var orðin honum ov tungur at dansa við.

Í staðin valdi hann sær Finnboga Ísakson til politiskan samstarvspartnara, og fyri at fáa politiskan meiriluta, hongdu teir Fólkaflokkin aftursút.

Hetta umskiftið man hava eydnast væl, hesir fingu og fáa framvegis stuðul frá meginpartinum av veljarunum kring landið, hóast úrslitið er eitt land í búskaparligari neyðstøðu, í harðari kapping við suðurameríkansku bananrepublikkirnar.

Seinasta landsstýrið við Atla Dam á odda lovaði okkum, um hann slapp frá at velja millum pest og kolera, eitt búskaparligt skrædl rætta vegin eftir bert 500 døgum. Hann slapp frá at velja! Í staðin fingu vit ein vøkstur í okkara uttanlandsskuld upp á umleið 1,5 mió.kr. um dagin hesi seinastu fýra árini, uttan at ávísast kann á framleiðandi virðir av týdningi. Umframt hetta fingu vit eitt rekord hall í gjaldsjavnaðinum, og munurin millum inn- og útflutning økist fyri hvønn dag.

Komandi fýra árini hevur Finnbogi Ísakson valt at seta Javnaðarflokkin uttanfyri. Orsøkin er helst, at Tjóðveldisflokkurin følir seg at vera dotnan niður ímillum, tá talan er um yvirtøkur, í mun til Javnaðarflokkin, nú skal javnvág fáast í, og tað kemur at kosta, ongin ivi um tað.

Men eina fíggjarlóg skulu vit hava. Uppskotið, ið farna landsstýrið legði fram, javnvigar við 3.050.701.000 kr., meðan nývalda landsstýrið, eftir eini skundisligari viðgerð, er komið fram til eina hægri skattainntøku sclciðis, at hesir fáa eina javnvág í við 3.140.701.000 kr.

Undir viðgerðini er komið fram, at á fíggjarlógini fyri 1988, sum var valár, eru konstaterað yvirtrekk upp á uml. 200 mió.kr., harav eitt einstakt í 100 millióna klassanum, og

at fiskivinnuni tørvar einar 60 mió.kr. eyka í 1988.

Vit fáa at vita, at um fiskivinnan skal liggja á somu prislegu í ár, sum í 1988, so koma at vanta einar 200 mió.kr. í, umframt tað, sum er sett á komandi fíggjarlógaruppskot. Hetta eru fyribils metingar, ivaleyst verða inntøkulógir lagdar fyri tingið, tá ið tað líður nakað út árið, um alt skal harga saman fíggjarliga. Sparitiltøkini, tað ljóðaði alt so væl, fána burtur.

Dreymurin um minni skatt, minni toll o.s.fr., verður ivaleyst bert við dreymin. Einasta menn tykjast vera samdir um, er at fáa yvirtøkunevndina at virka, vit fóru snøgt sagt úr øskuni í eldin.

Søgan endurtekur seg, vit læra tíverri ikki av okkara politisku mistøkum.

Heldur henda gongd fram, væntar minnilutin, at vit fáa ikki høvi til at gera okkara egnu fíggjarlóg leingi aftur-at, tað koma aðrir at gera fyri okkum, men vit vilja stríðast fyri at bøta um okkara vánaligu búskaparligu viðurskifti við at leggja upp til broytingar í mun til landsstýrisins upp-skot.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til uppskot landsstýrisins:

Grein 11: Landsfyrisitingin.

Konto 11359: Almannastovan, verður hækka við 1 mió.kr. og sett til kr. 14.876.300.

Konto 11072: Fyrireiking av umhvørvisfyrisiting, verður lækkað við kr. 800.000. og sett til kr. 200.000.

Konto 11725: Stovnseting av landsbanka v.m. verður (lækkað við 3 mió.kr. og sett til 0. kr.) strikað.

Konto 11953: Fyrisitingarnús í grunn verður lækkað við 5 mió.kr. og sett til 1 mió.kr.

Greinin verður sostatt sett til kr. 149.584.000.

Grein 13: Samferðslumál:

Konto 13023: Havnagerð í grunn verður lækkað við 3 mió.kr. og sett til 75 mió.kr.

Konto 13042: Flogferðsla í grunn verður lækkað við 3 mió.kr. og sett til 20 mió.kr.

Konto 13106: Byggigrunnur Strandferðslunnar verður strikað (1,5 mió.kr.)

Konto 13111: Millumbylgjustøð verður strikað (3 mió.kr.)

Greinin verður sett til 305.300.000 kr.

Grein 14: Skúlamál:

Konto 14471: Útgerð til tekniskar skúlar og handilsskúlar verður lækkað við 1.100.000 kr. og sett til kr. 3.350.000.

Konto 14307: Føroya Sjómansskúli verður hækkað við kr. 300.000 og sett til kr. 6.308.500.

Konto 14661: Skúli fyri fisklíðnað og havbúnað verður lækkað við kr. 200.000 og sett til kr. 1.800.000. Viðm: Til skúla í Norðstreymoy.

Konto 14901, 313128: Stuðningur til Í.S.F. verður lækkað við kr. 200.000 og sett til kr. 3.800.000.

Konto 14901, 313302: Ítróttar-/og skúlabyggigrunn verður lækkað við 3 mió.kr. og sett til kr. 24.000.000.

Konto 14901, 313343: Aðrir stud. og H.F.-skúlar í grunn verður lækkað við 2 mió.kr. og sett til kr. 7.000.000.

Konto 14901.313559: Læraraskúli í grunn verður lækkað við 2 mió.kr. og sett til kr. 8.000.000.

Greinin verður sett til kr. 416.122.000.

Grein 15: Vísind, bókmentir og list.

Konto 15202: Verður lækkað við 4,1 mió.kr. og sett til kr. 7.966.000.

Konto 15907, 323307: Fiskirannsóknarstova í grunn verður lækkað við 5 mió.kr. og sett til 7.000.000 kr.

Konto 15907, 323331: Útvarp Føroya verður strikað.

Konto 15907, 323364: Sjónvarp Føroya verður strikað.

Konto 15907, 323372: Sjónvarpshús í grunn verður strikað.

Greinin verður sett til kr. 97.143.000.

Grein 16: Fiskivinna, sigling o.t.

Konto 16301, 253985: Bjargingarfeløg verður hækkað við kr. 20.000 og sett til kr. 200.000.

Konto 16904, 333017: Minstaløn og annar stuðul til fiskivirkuna verður hækkað við 150 mió.kr. og sett til 475.000.000 kr.
Konto 16904, 333082: Vaktarskip í grunn verður lækkað við 5 mió.kr. og sett til kr. 5.000.000.

Greinin verður sett til kr. 569.586.000.

Grein 17: Landbúnaður og matrikulering.

Konto 17015: Landsdjóralæknaembætið verður hækkað við kr. 210.000 og sett til kr. 3.799.000.

Greinin verður sett til kr. 50.579.000.

Grein 18: Handil og iðnaður o.t.

Konto 13907, 353146: (nýggj grein) Ferðaendurgjald til læruplass verður sett til kr. 400.000.

Greinin verður sett til kr. 42.912.

Grein 19: Almannamál v.m.

Konto 19904, 363685 Húsalánsgrunnur verður lækkað við 10 mió.kr. og sett til kr. 30.000.000.

Konto 19918: Skúlin á Tróni verður hækkað við kr. 250.000 og sett til kr. 16.550.000.

Greinin verður sett til kr. 782.167.000.

Grein 23: At leggja í ymsar grunnar v.m.

Konto 23203, 383168: Oljugrunnur hækkar við 40 mió.kr. og sett til kr. 105.000.000.

Greinin verður sett til kr. 145.741.000.

Grein 27: Reguleringskonto.

Konto 27005: Verður strikað.

Greinin sett til kr. 0.

Viðlagd skjøl:
Skjal 1: § 13 samferðslumál (álit meirilutans)
Skjal 2: til álit Sambandsfloksins

FIGGJARNEVNDIN, 15. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Pouisen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Jørgen Thomsen

Vilhelm Johannesen

Skjal til § 13 Samferðslumál (álit meirilutans).

	mió. kr.
Vági-Lopra	1,0
Trongisvág-Øravík	1,0
Vegagerð á Sandi (á Múlanum)	1,0
Miðvági-Vatnsoyrar, Vegagerð og kloak.	1,5
Syðradalsvegurin (3)	0,5
Tórshavn-Kirkjubøar	1,5
Eiðisvegurin	1,0
Funningsvegurin	1,0
Skipanesvegurin	1,0
Strondum-Skála	1,0
Rituvíkarvegurin-Rituvík(	
Mýruvegurin-Runavík (	2,0
Klaksvik-Norðoyrar	1,0
Múlavegurin	2,0
Fugloy	0,5
At taka til	3,5
Tilsamans	19,5

Av "at taka til" fær Kollafjørður-Hósvík kr. 1,5 mió.

Berghols- og brúgvageð, í grunn	61,0
Felags	5,5
Tilsamans	86,0

Evni	Fylgiskjal	
a. Nýgerð av vegum og tunnlum	2 & 2.1	86,0
b. Trygdartiltøk		3,0
c. Vanligt hald	3	14,0
d. Vetrarhald	4	5,0
e. Størri ábøtur á vegir	5	2,0
f. Vegastokkur	6 & 6.1	2,5
g. Asfaltering undir viðlíka-haldsdeildini	7	6,0

h.	Ferjulegur	8	3,5
i.	Grótbrot og skervverk	9, 9.1 & 9.2	8,5
j.	Asfalt og asfaltverk	10, 10.1 & 10.2	9,0
k.	Mobil amboð (rakstur)	11 & 11.3	10,5
l.	Amboðskeyp og gjaldskyldur	11, 11.1 & 11.2	18,0
m.	Smiðjur, rakstur og umbyggingar	11 & 11.4	15,5
n.	Studningsvegir		9,0
	Tilsamans		192,5
	÷ Kommununanna partur		15,0
			177,5
	Herav 13061 Berghols- og brúgvagerð, í grunn		61,0
	13061		116,5

Skjal til álit Sambandsflokkins í løgtingsmáli nr. 64/1988.

BROYTINGAR TIL UPPSKOT LANDSSTÝRISINS.

Grein nr.	Upphædd. eru í heilum 1000 kr.	Føroya Landsst.	Sambandsflokkurin Hækkan	Lækkan	Uppskot
	INNTØKUR				
01	SKATTUR	1310000			1310000
02	TOLL- OG FRAMLEIÐSLUGJØLD	1068000			1148000
	Hækkan av tolli og brennioljug		40000		
	Hækkan av brennioljugjaldi		40000		
03	ONNUR GJØLD	12430			12430
04	INNTØKUR AV SPÆLI	1200			1200
05	RENTUR OG VINNINGSBÝTI V.M.	3000			3000
07	AVLOP FRÁ DANSKA TJÓÐARBANK.	15000			15000
08	GJALDINGAR FRÁ DANSKA STATINUM	731066			748713
	Afturgjald frá statinum		17647		
09	YMSAR INNTØKUR	5			5
	Inntøkukonti ialt	3140701	97647	0	3238348
	ÚTREIÐSLUKONTI				
06	LANDSSTOVNAR	37859			37859
10	LØGTINGIÐ	15234			15234
11	LANDSUMSITINGIN	157384			149584
	Almannastovan		1000		
	Umhvørvisfyris. fyrireiking			800	
	Landsbankin, stovnseting			3000	
	Fyristingarhús í grunn			5000	
12	HEILSUMÁL	400808			400808
13	SAMFERÐSLUMÁL	315800			305300
	Havnagerð í grunn			3000	
	Flogferðsla í grunn			3000	
	Byggigrunnur Strandferðslunar			1500	
	Millumbylgjustøð			3000	
14	SKÚLAMÁL	424322			416122
	Útgerð, tekn.-og handilsskúlar			1100	
	Føroya Sjómannaskúli		300		
	Skúli, fiskiídn. og havbúni			200	
	Studn. til Í.S.F.			200	
	Ídróttar- og skúlabyggigr.			3000	
	Aðrir studn. og HF-skúlar í gr.			2000	
	Læraraskúli í grunn			2000	
15	VÍSIND, BÓKMENTIR OG LIST	125843			97143
	Fólkabókasøvn			4100	
	Fiskirannsóknarstovan í grunn			5000	
	Útvarp Føroya, tilskot			4000	
	Sjónvarp Føroya			5600	
	Sjónvarpshús í grunn			10000	
16	FISKIVINNA, SIGLING O.T.	424566			569586
	Minstaløn o.a. stuðul til fiskiv.		150000		
	Bjargingarfeløg		20		
	Vaktarskip í grunn			5000	
17	LANDBÚNAÐUR OG MATRIKULERÍNG	50369			50579
	Landsdjóralæknaembætið		210		
18	HANDIL OG ÍDNAÐUR O.Y.	42512			42912
	FerðaFerðaendurgjald, læruplass		400		
19	ALMANNAMÁL	791917			782167

				10000	
	Húsalánsgrunnurin		250		
	Skúlin á Trøðni	5265			5265
20	PENSIÓNSÚTREIÐSLUR	105000			105000
21	EFFEKTIVAR VEDHALDSBINDINGAR	4835			4835
22	ADRAR ÓVISSAR ÚTREIÐSLUR	105741			145741
23	AT LEGGJA Í YMSAR GRUNNAR V.M.		40000		
	Hækkan brennioljugjaldi	4000			4000
24	AVDRÁTTIR AV LÁNUM	54305			54305
25	AVSKRIVINGAR	700			700
26	YMSAR OGNARÚTREIÐSLUR	45000			0
27	REGULERINGSKONTO			45000	
	Reguleringskonto				
	Útreiðslukonti ialt	3111461	192180	116500	3187141
	Inntøkukonti ialt	3140701	97647	0	3238348
	Avlop	29240	94533	116500	51207

Uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri árið 1. januar - 31. december 1989.

Forslag til finanslagtingslov for året 1. januar - 31. december 1989.

Yvirlit yvir rakstrarætlan fyri fíggjarárið 1989
Oversigt over driftsbudgettet for finansåret 1989

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 1.	Skattir ..... Skatter	1.310.000.000	
§ 2.	Toll- og framleiðslugjøld ..... Told- og fremstillingsafgifter	1.108.000.000	
§ 3.	Onnur gjøld ..... Andre afgifter	12.430.000	
§ 4.	Inntøkur av spæli ..... Indtægter ved spil	1.200.000	
§ 5.	Rentur og vinningsbýti v.m. ..... Renter og udbytte m.v.	3.000.000	
§ 6.	Landsstovnar ..... Landsvirksomheder		÷42.059.000
§ 7.	Partur av avlopi danska tjóðarbankans ..... Andel i den danske Nationalsbanks overskud	15.000.000	
§ 8.	Gjøld frá danska statinum..... Betalinger fra den danske stat	748.713.000	
§ 9.	Ymsar inntøkur ..... Diverse indtægter	5.000	
			42.059.000
	Nettoinntøka/Nettoindtægt		3.156.289.000
		3.198.348.000	3.198.348.000

		Útreiðslur Udgifter kr.
§ 10.	Løgtingið Lagtinget	15.244.000
§ 11.	Landsumsitingin Landsadministrationen	157.107.000
§ 12.	Heilsumál Sundhedsvæsenet	400.505.000
§ 13.	Samferðslumál Kommunikationsvæsen	319.300.000
§ 14.	Skúlamál Undervisningsvæsen	422.470.000
§ 15.	Vísindi, bókmentir og list Videnskab, litteratur og kunst	123.143.000
§ 16.	Fiskivinna, sigling o.t. Fiskeri, søfart o.l.	423.584.000
§ 17.	Landsbúnaður og matrikulering Landbrug og matrikulering	51.079.000
§ 18.	Handil, íðnaður v.m. Handel, industri m.v.	50.016.000
§ 19.	Almenn forsorg Socialvæsen	820.749.000
§ 20.	Pensjónsútreiðslur Pensionsudgifter	5.265.000
§ 21.	Effektivar veðhaldsbindingar Effektive garantiforpligtelser	105.000.000
§ 22.	Aðrar og óvissar útreiðslur Andre og uvisse udgifter	4.835.000
§ 23.	At leggja í ymsar grunnar v.m. Henlæggelser til forskellige fonds m.v.	145.741.000
§ 24.	Avdráttir av lánum Afdrag på lån	4.000.000
§ 25.	Avskrivingar Afskrivninger	54.305.000
§ 26.	Ymsar ognarútreiðslur Diverse ejendomsudgifter	700.000
§ 27.	Reguleringarkonto Reguleringskonto	50.000.000
	Tilsamans/Alt	3.153.043.000
	Meirinntøka/Merindtægt	3.246.000
		3.156.289.000

Yvirlit yvir flytingar á ognar- og kapitalkonti í fíggjarárinum 1989

Versigt over bevægelser på formue- og kapitalkonti i finansåret 1989

		Brutto inntøka indtægt kr. (1.000)	Brutto útreiðsla udgift kr. (1.000)	Netto inntøka indtægt kr. (1.000)	Netto útreiðsla udgift kr. (1.000)
§ 30.	Kassakonto ..... Kassekonto	369.821		369.821	
§ 31.	Virðisbrøv ..... Værdipapirer		750		750
§ 32.	Útlán ..... Udlån	9.575	7.000	2.575	
§ 33.	Inntøkueftirstøður ..... Indtægtsrestancer		67.050		67.050
§ 34.	Aktiv hjá grunnum ..... Aktiver tilhørende fonds	423.026	662.100		239.074
§ 35.	Aktiv hjá deponentum ..... Aktiver tilhørende deponenter		80.000		80.000
§ 36.	Millumrokningar til góðar ..... Mellemregning til gode	112.408	158.325		45.917
§ 37.	Fastar ognir og anlegg ..... Fast ejendom og anlæg	40.750	2.000	38.750	
§ 38.	Skip ..... Skibe	16.500		16.500	
§ 39.	Millumrokning við nýtt fíggjarár .... Mellemregning med nyt finansår	150.000	350.000		200.000
§ 40.	Millumrokning, skuld ..... Mellemregning, gæld	1.000		1.000	
§ 41.	Lán ..... Lån		58.000		58.000
§ 42.	Deposita ..... Deposita	15.000		15.000	
§ 43.	Grunnar ..... Fonds	666.000	426.926	239.074	
§ 44.	Burturlegg. og avskr. ..... Henlæggelser og afskr.	4.000	39.000		35.000
§ 45.	Kapitalkonto ..... Kapitalkonto	43.071		43.071	
		1.851.151	1.851.151	725.791	725.791

INNTØKUR:
INDTÆGTER:

Landskassans inntøkur í fíggjarárinum 1989 verða mettar sum tilskilað í §§ 1-9.
I finansåret 1989 beregnes landskassens indtægter som anslået i §§ 1-9.

		Rokningur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 1.	Skattir Skatter			
1201	Vanligur landsskattur Sædvanlig landsskat	1.004.800	1.030.000	1.250.000
1507	Sjómansskattur ..... Sømandsskat	14.281	8.000	0
1702	Rentuskattur ..... Renteskat	27.432	14.000	30.000
1804	Vegskattur ..... Vejskat	28.245	30.000	30.000
		1.074.758	1.082.000	1.310.000
§ 2.	Toll- og framleiðslugjøld, skrásetingargjald: Told- og fremstillingsafgifter, registreringsafgifter:			
2017	Tollgjøld ..... Toldafgifter	952.137	815.000	850.000
2041	Brennioljugjald .... Brændselsolieafg.	93.367	65.000	105.000
2708	Framleiðslugjald ... Fremstillingsafg.	28.419	28.000	30.000
2713	Skrásetingargjald Registreringsafgifter			
23615	Virðis- og vektargj. Værdi- og vægtafg.	0	160.000	120.000
33014	Umskrásetingargjald Afgift for omregistrering	2.832	2.700	3.000
		1.076.755	1.078.700	1.108.000

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 3.	Onnur gjøld:			
	Andre afgifter:			
3052	Gjøld fyri spiritusskamtanarkort	192	200	200
	Afgifter for spiritusrationeringskort			
3102	Loyvisgjøld	84	100	100
	Afgifter for bevillinger			
3154	Ferðaavgjald	8.414	6.000	10.000
	Rejseafgift			
3204	Arvagjøld	2.302	1.000	2.000
	Arveafgifter			
3256	Lestagjald	38	100	100
	Skibsafgift			
3501	Bøtur		30	30
	Bøder			
		11.080	7.430	12.430
§ 4.	Inntøkur av spæli:			
	Indtægter ved spil:			
4011	Avlop av happadrátti ..	255	600	600
	Overskud ved lotteri			
4058	Burturlutingargjøld ...	234	100	100
	Afgifter af lotteri			
4096	Gjøld av øðrum vinningum	479	500	500
	Afgift af andre gevinster			
		968	1.200	1.200

		Reknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 5.	Rentur og vinningsbýti v.m.: Renter og udbytte m.v.:			
5105	Rentuinntøkur ..... Renteindtægter	36.024	25.000	36.000
5207	Rentuútreiðslur ..... Renteudgifter	÷44.596	÷40.854	÷33.000
		÷ 8.572	÷15.854	3.000
§ 6.	Landsstovnar: Landsvirksomheder:			
6009	Tyrlutænastan..... Helikoptertjenesten	–	÷11.500	÷10.800
6014	Strandfaraskip Landsins..... Lagtingets kystfart	÷47.795	÷43.800	÷45.000
6033	Bygdaleiðir..... Busruter	÷23.061	÷22.000	÷23.700
6102	Tjaldurs Apotek ..... Tjaldurs Apotek	2.298	÷ 1.585	3.026
6204	Telefonverkið..... Telefonvæsenet	26.081	26.000	39.825
6306	Útvarpið ..... Radiofonien	199	0	0
6311	Sjónvarp Føroya ..... TV	÷1.610	÷625	÷625
6358	Postverkið ..... Postvæsenet	÷5.289	÷6.395	÷5.385
6408	Oljugoymslur ..... Oliean læg	1.155	1.200	1.200
6567	Hvalastøðin við Áir... Hvalstationen við Áir	-286	÷215	÷200
6572	Stórahús við Áir ..... Det store hus við Áir	÷45	÷45	÷400
		÷48.353	÷58.965	÷42.059

	Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 7. Partur av avlopi danska tjóðarbankans samb. lóg: Andel i den danske nationalbanks overskud iflg.lov:			
7011 Partur av avlopi danska tjóðarbankans smb. lóg Andel i den danske Nationalbanks overskud iflg. lov	31.657	10.000	15.000
	31.657	10.000	15.000
§ 8. Gjøld frá danska statinum Betalinger fra den danske stat			
8001 Heildarveiting ..... Bloktilskud	-	480.000	516.179
8005 Afturgjald ..... Tilbagebetaling	-	182.800	232.534
	0	662.800	748.713
§ 9. Ymsar inntøkur Diverse indtægter			
9105 Ymsar inntøkur..... Diverse indtægter	15	5	5
	15	5	5
Samanløgd inntøka Samlede indtægter	2.138.308	2.759.316	3.156.289

Útreiðslur:
Udgifter:

Landskassans útreiðslur í fíggjarárinum 1989 ætlast sum tilskilað í §§ 10-26.
I finansåret 1989 anslås landskassens udgifter som anført i §§ 10-26.

		Rokniskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 10	**Løgtingið** **Lagtinget**			
10018	Løgtingsmenn	7.705	8.175	8.725
	Lagtingsmedlemmer			
10106	Løgtingsbygningur.....	1.217	325	765
	Lagtingsbygning			
10158	Løgtingsskrivstovan	583	1.940	1.899
	Lagtingssekretariat			
10163	Tingmannaráð Útnorðurs	-	200	220
	Vestnordens parlamentarikersamarb.			
10208	Løgtingstíðindi, Kunngerðasavn...	283	700	420
	Lagtingstiderne, Kundgørelses-samling.			
10301	Grannskoðan (extern)	116	120	130
	Revision (extern)			
10403	Grannskoðan (intern)	2.137	2.727	2.764
	Revision (intern)			
10505	Landsskattaráðið	81	100	101
	Landsskatteudvalg			
10607	Norrønt Ráð	37	75	75
	Nordisk Råd			
10709	Norrønt samstarv	99	75	100
	Nordisk samarbejde			
10714	Menningargrunnur Útnorðurs	134	40	45
	Vestnordenfonden			
		12.392	14.477	15.244

		Rokniskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 11.	Landsfyrisitingin: Landsadministrationen:			
11015	Løgmaður og landsstýri ..... Lagmand og landsstyre	2.965	2.966	2.980
11048	Kunngerðasavn og -blað Bekendtgørelsessamling og -blad	-	-	380
11053	Landsskrivstova ..... Landskontor	10.010	15.525	16.177
11072	Fyrireiking av umhvørvisfyrisiting ..... Forberedelse af miljøadministration	-	-	300
11103	Fiskivinnustova ..... Fiskerikontor	700	-	-
11155	Uttanríkistænasta í Aberdeen ..... Udenrigstjeneste i Aberdeen	1.106	656	795
11205	Føroysk Viðskiftastova í København ..... Det færøske repræsentationskontor i København	959	1.091	1.151
11219	Líkningarráðið, N.deild Ligningsråd, N.afd.	1.465	1.796	1.678
11224	Líkningarráðið, Suðuroyar deild Ligningsråd Suðuroy afdeling	891	1.055	1.077
11238	Líkningarráðið, Sandoyar deild Ligningsråd, Sandoy afdeling	662	664	603
11243	Líkningarráðið, Vága deild Ligningsråd, Vágoy afdeling	915	841	889
11257	Líkningarráð ..... Ligningsråd	22.235	27.930	26.037

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
11262	Líkningarráð, N-streymoyardeild Ligningsråd, N-streymoyar afd.	-	-	894
11276	Skráasetingareftirlit. Registertilsyn	87	400	400
11281	Líkningarráð, Suðlafj. deild Ligningsråd, Suðlafj. afd.	-	-	776
11295	Líkningarráð, Runavíkar deild Ligningsråd, Runavíkar afd.	-	-	1.001
11307	Landsfólkayvirlit..... Folkeregister	903	1.145	1.045
11359	Almannastova ..... Socialforvaltning	13.445	16.049	15.747
11409	Landsskúlafyrisitingin ..... Landsskoleadministrationen	9.891	15.048	15.463
11414	Fyrisiting av lestrarstuðuli Administr. af uddannelsesstøtte	-	-	750
11447	Føroya Tollstova ..... Færøernes Toldkontor	6.314	8.875	9 517
11452	Føroya Gjaldstova .... Færøernes oppebørselskontor	16.843	12.322	12.492
11466	Tollstovudeild í Klaksvík ..... Toldfilial i Klaksvik	748	894	855
11471	Tollstovudeild í Saltangará ..... Toldfilial i Saltangará	705	1.030	1.097

		Rokniskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
11485	Tollstovudeild í Fuglafirði Toldfilial i Fuglafirði	520	593	746
11499	Tollstovudeild á Tvøroyri Toldfilial i Tvøroyri	651	648	782
11502	Tollstovudeild í Vági Oppebørselsfilial í Vági	489	514	539
11516	Tollstovudeild í Sørvági Toldfilial i Sørvági	405	536	486
11521	Tollstovudeild í Norðstreymoy Toldkontor í Norðstreymoy	-	-	600
11535	Tollstovudeild á Sandi Toldkontor på Sand	-	-	500
11549	Endurgjald til sýslurnar fyri skrivstovuhald Kontorholdsgodtgørelse til syslerne	0	65	0
11554	Tolleftirlit Toldkontrollen	5.019	4.949	5.382
11558	Trygdareftirlit Sikkerhedskontrol	547	862	-
11604	Valuta- og prisráð Valuta og Prisråd	1.130	1.564	1.418
11656	Lønarráð Lønningsråd	-	25	50
11661	Heilsu- og heimasjúkrasystrafyrisitingin Administration af sundheds- og hjemmesygeplejeordningen	944	1.288	1.518
11703	Búskaparráð Økonomisk råd	318	453	433

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
11709	Hagdeildin	3.451	4.438	4.620
	Statistisk kontor			
11725	Stovnseting av landsbanka v.m.	-	4.000	2.000
	Etablering af landsbank m.v.			
11758	Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands	7.074	4.000	5.000
	Rejse- og dagpenge inden- og udenlands			
11808	Innheintingarútreiðslur ...	376	300	400
	Udgifter ved inkasso			
11851	Ognin Tinganes	1.702	2.383	2.939
	Ejendommen Tinganes			
11901	Landsverkfrøðingsskrivstova	11.005	12.686	11.590
	Landsingeniørens kontor			
11953	Fyrisitingarhús í grunn....	1.000	1.000	6.000
	Administrationsbygning i fond			
		125.725	148.621	157.107
§ 12.	Heilsumál:			
	Sundhedsvæsen:			
12007	Sjúkrakassar	-	10.000	11.000
	Sygekasser			
12012	Hjálpitólamiðstøð	-	3.480	3.535
	Central for hjælpeudstyr			
12026	Útreiðslur viðv. Ríkishospitalinum	-	22.000	22.800
	Udg. vedr. Rigshospitalet			
12109	Landssjúkrahúsið (D.A.H.).	96.892	236.092	244.151
	Landssygehuset (D.A.H.)			
12202	Klaksvíkar sjúkrahús.....	23.942	43.182	44.803
	Klaksvik sygehus			
12304	Suðuroyar sjúkrahús	11.416	23.519	27.080
	Suderø Sygehus			

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
12318	Sjúkrahúsbygging, í grunn. Opførelse af hospitaler, i fond	-	16.000	25.000
12406	Heilsumiðstöðir í grunn... Sundhedscentre, henl. i fond	2.000	3.000	2.000
12411	Planlegging fyri sjúkrahúsverkið Planlægning for sygehusvæsenet	165	-	-
12508	Læknar ..... Læger	617	1.873	1.873
12513	Amanuensis ..... Amanuensis	-	100	100
12653	Heilsu- og heimasjúkra-systraskipan ..... Sundheds- og hjemmesyge-plejeordning	6.059	10.049	12.490
12672	Skúlalæknaskipan ..... Skolelægeordning	114	150	264
12756	Heilsustjóri, stovnan..... Medisinaldirektør, etablering	-	-	300
12769	Arbeiðsmedicinsk klinikk.. Arbejdsmedicinsk klinik	-	870	779
12774	Upplýsing um eyðkvæmi .... Oplysning om AIDS	-	400	400
12907	Ymiskar útreiðslur: Diverse udgifter:			
303011	Farsóttir ..... Epidemiske sygdomme	11	70	70
303044	Hvíldarheim."Naina". Hvilehjemmet "Naina"	1.000	1.300	1.600
303077	Vaksinatiónir ..... Vaccinationer	166	620	600

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Áætlun 1989 kr. (1.000)
303107	Upplýsing um gitnaðarfyribyrging ..... Oplysning om svangerskabsforebyggelse	356	265	265
303115	Tubakksráð/Rúsevnisráð Tobaksråd/ Råd mod rusende stoffer	-	100	250
303148	Heilsukanningar av barnakonum Sundhedskontrol for gravide	-	280	280
303156	Læknakanningar av børnum Lægeundersøgelse af børn	-	700	700
303164	Kanning og viðgerð av kynssjúkum ..... Undersøgelse og behandling af veneriske sygdomme	-	65	65
373305	Landsstýrinum at ráða yvir ..... Landsstyret at råde over	166	150	100
		142.904	374.265	400.505

Viðmerking
til § 12.12318
Samboert lóg skulu setast 25 mió. kr. um árið í grunn í 6 ár, frystu ferð í 1989.

Anmærkning
til § 12.12318
Ifølge lov skal afsættes 25 mio. kr. årlig i fond i 6 år, første gang i 1989.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 13.	Samferðslumál:			
	Kommunikationsvæsen:			
	13001 Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum	114.747	107.200	116.500
	Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje			
	13023 Havnagerð, í grunn.....	42.500	60.500	78.000
	Havnebygning, henl. i fond			
	13037 Lendingar, í grunn	26.400	25.000	26.000
	Landingspladser, henl. i fond			
	13042 Flogferðsla, í grunn	12.000	13.000	23.000
	Flyvetrafik, henl. i fond			
	13061 Berghols- og brúgvagerð í grunn	22.000	58.000	61.000
	Tunnel- og brobygning, henl. i fond			
	13075 Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn (viðm.)	6.500	6.000	5.500
	Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond (anm.)			
	13089 Byggi- og rakstrargr. postverksins	-	3.000	3.000
	Postvæsenets bygge- og driftsfond			
	13106 Byggigrunnur Strandferðslunnar ...	-	-	0
	Kystfartens byggefond			
	13111 Millumbylgjustøð	-	-	0
	Mellembølgestation			
	13227 Vegagerð í sambandi við brennistøð	1.772	6.300	1.800
	Vejkonstruktion i forb. med forbrændingsanstalt			
		225.919	279.000	319.300

Viðmerkingar
til § 13.13075

Kommunurnar eiga kr. 115,- pr. íbúgva pr. ár í mun til fólkatalið við seinastu fólkateijing.

Anmærkninger
til § 13.13075

Kommunerne tildeles kr. 115,- pr. beboer pr. år i forhold til befolkningstallet ved den seneste folketælling.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 14.	Skúlamál:			
	Undervisningsvæsen:			
14053	Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið	1.085	1.224	2.243
	Fællesudgifter for skolevæsenet			
14067	Endurgjald til rithøvundar	100	250	250
	Refusion til forfattere			
14103	Fólkaskúlin	66.052	164.215	172.500
	Folkeskolen			
14155	HF-skeið í Suðuroy.....	3.241	3.286	3.700
	HF-kursus på Suðuroy			
14169	HF-skeið í Klaksvík	2.648	3.113	2.700
	HF-kursus i Klaksvík			
14174	Eysturoyar studentaskúli og HF-skeið	9.954	12.077	12.000
	Eysturoyar studenterskole og HF-kursus			
14205	Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum	18.508	19.888	20.000
	Gymnasium og HF-kursus i Hoydølum			
14257	Kostdeild Studentaskúlans..	2.086	2.734	2.538
	Studenterskolens kostafdeling			
14262	Studentaskúlaheim. í grunn	-	-	300
	Studenterkollegier i ford			
14307	Føroya Sjómansskúli	9.998	8.279	6.525
	Færøernes Navigationsskole			
14397	Tekniski skúlin í Klaksvík	-	5.257	4.557
	Teknisk skole i Klaksvik			
14409	Klaksvíkar sjómansskúli ...	1.837	2.198	2.265
	Klaksvik Navigationsskole			

		Rokniskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
14414	Føroya Maskinskúli ..... Færøernes Maskinskole	3.848	8.516	8.116
14433	Maskinútbúgving í Klaksvík Maskinuddannelse i Klaksvik	298	318	351
14447	Tekniskur skúli í Tórshavn. Teknisk skole i Torshavn	-	14.822	12.397
14452	Skúlaheim í Tórshavn ..... Skolehjem i Tórshavn	-	3.002	2.880
14466	Skúlaheim í Klaksvík ..... Skolehjem i Klaksvik	-	1.765	1.535
14471	Útgerð til tekniskar skúlar og handilsskúlar Udstyr til tekniske og handelsskoler	-	2.550	3.500
14485	Føroya Handilsskúli..... Færøernes Handelsskole	-	9.518	12.000
14499	Føroya Læraraskúli..... Førøernes Seminarium	-	10.615	11.000
14502	Føroya Fólkaháskúli ..... Færøernes Folkehøjskole	2.332	2.577	2.800
14516	Privatir skúlar ..... Private skoler	-	1.000	1.000
14554	Húsarhaldsskúlar ..... Husholdningsskoler	560	772	660
14604	Fritíðarundirvising ..... Fritidsundervisning	2.339	13.805	10.000
14618	Studn. til musikkskúlar ... Tilskud til musikskoler	2.987	4.459	4.200
14655	Landsmiðstøð fyri undirvísingarambod ..... Landscentral for undervisningsmateriale	615	2.759	2.678
14658	Útbúgvingarstyrkur ..... Statens uddannelsesstøtte	-	10.000	-

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
14661	Skúli f. fiskaíðnað og havbúrað Skole f. fiskeindustri og havbrug	-	1.146	1.800
14675	Sjóvinnuskúli ..... Søfartsskole	-	2.500	1.200
14901	Ítrótt: Idræt:			
	313103 Lánsgr.til ítróttar-anlegg ..... Lånefond til idrætsanlæg	100	100	100
	313128 Studn.til Í.S.F. (viðm.)..... Tilskud til Í.S.F. (anm.)	2.150	2.940	3.600
	313136 Studn.til ferðir innancyggja ..... Tilskud til indenlands rejser	1.480	1.500	1.500
14953	Ymiskir studningar: Diverse tilskud:			
	313129 Nýggj grein: 313707 Oyggjaleikir 1989 Ø sportslege 1989			1.500
	313152 Grunnur til útbúgving Fond til uddannelse	10.000	15.000	45.000
	313215 Lærlingar ..... Lærlinge	200	200	200
	313223 Landbúnaðarnæmingar.. Landbrugselever	-	40	40
	313256 Ymisk framhaldsundirv. Diverse fortsættelses-undervisning	-	15	15
	313264 Skúlabarnaferðir uttanl. Skolebørns rejser udenl.	81	65	65
	313272 Skúlabarnaferðir innan-oyggja ..... Skolebørns rejser in-denlands	361	450	450

		Rokniskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
313302	Ítróttar- og skúla-byggigr. (viðm.) ..... Idræts- og skolebyg-gefond (anm.)	19.000	27.000	27.000
313319	Sjómansskúli í grunn..... Navigationsskole i fond	8.000	7.000	2.000
313335	Studentaskúli í Høydølum í grunn ..... Gymnasium i Høyd. hen-lægges i fond.	500	500	1.000
313343	Aðrir studenta- og HF-skúlar, í grunn ..... Andre gymnasium og HF-skoler, henl. i fond	2.000	2.000	9.000
313351	Náminsgastudningur til listamenn ..... Tilskud til kunstneres uddannelse	35	50	50
313376	MFS og MFÚ ..... MFS og MFÚ	140	174	225
313384	Norrøna Felagið ..... Foreningen Norden	160	205	225
313406	Studn. til fremmand, ið lesa í Føroyum ..... Tilskud til ikke-fæ-ringer, der studerer på Færøerne	20	35	35
313422	Landsskúlafyrisiting-ini at ráða yvir ..... Landsskoleadministra-tionen at råde over	98	0	0

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
313439	Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir: Eftirútbúgving av handverkarum	132	600	600
	Landsadministrationen at råde over: Efteruddannelse af håndværkere			
313455	Ungmannafeløgini og skótarørslan	600	500	700
	Ungdomsforeningerne og spejderbevægelser.			
313471	Eftirútbúgv. av sjómonn...	67	116	200
	Efteruddan.af sømænd			
313496	Undirvisingartilfar til framhaldsskúlar	-	2.000	2.000
	Undervisningsmateriel til fortsættelsesskoler			
313559	Læraraskúli í grunn (viðm.).	-	-	10.000
	Seminarium i fond (anm.).			
313567	Maskinskúli í grunn (viðm.).	-	-	2.000
	Maskinskole i fond (anm.).			
313575	Tekniskir skúlari í grunn (viðm.)	-	-	5.000
	Tekniske skoler i fond (anm.)			
313583	Sjóvinnuskúli í grunn (viðm.)	-	-	2.000
	Søfartsskole i fond (anm.)			
313591	Fiskidnaðarskúli í grunn (viðm.)	-	-	2.000
	Fiskeindustriskole i fond (anm.)			
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	495	275	250
	Landsstyret at råde over			
		173.797	370.410	422.470

Viðmerking
til § 14.14952/313302

Studningur til graslíkisvallir og skúlabyggingar verður at veita saman við fíggjar nevndini.

Tilskud til kunstgræsplæner og skolebyggeri bevilges sammen med finansudvalget.

til § 14.14953/313319
§ 14.14953/313335
§ 14.14953/313343
§ 14.14953/313439
§ 14.14953/313559
§ 14.14953/313567
§ 14.14953/313583
§ 14.14953/313591

Verður at veita saman við fíggjarnevndini.

Bevilges sammen med finansudvalget.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 15.	Vísindi, bókmentir og list: Videnskab, litteratur og kunst:			
15109	Landsbókasavn ..... Landsbibliotek	3.921	4.720	5.122
15202	Fólkabókasøvn .(viðm.).... Folkebibioteker (anm.)	4.529	10.851	7.966
15304	Landsskjalasavn ..... Landsarkiv	2.561	2.755	2.633
15406	Føroya Fornminnissavn .... Færøernes museum	4.876	5.889	6.179
15508	Bygdasøvn (viðm.) ..... Bygdemuseer (anm.)	552	1.738	2.002
15551	Fiskirannsóknarstova ..... Fiskerbiologisk laborator.	13.413	6.620	6.691
15560	Biofar-prosjektið..... Biofar-projektet	-	835	264
15653	Fuglakanningarstøð v.m. .. Ornitologisk station m.v.	157	155	161
15672	Lógasavn ..... Lovsavnsbibliotek	-	600	600
15703	Náttúrugripasavn..... Naturhistorisk samling	2.555	4.179	4.957
15717	Samarbeiði D.G.U./ Føroya Jarðfrøðisavn..... Samarbejde D.G.U./ Føroya Jarðfrøðisavn	441	457	658
15755	Fróðskaparsetur Føroya.... Færøernes Akademi	9.970	13.049	14.596
15793	Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur) ..... Institutionar på Debes-artrøð (fællesudgifter)	1.306	1.556	1.763
15805	Heilsufrøðilig starvs-stova ..... Hygiejnisk laboratorium	4.403	5.050	5.055

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
15806	Heilsufrøðiliga starvsstovan í grunn Hygiejnisk labratorium i fond			500
15857	Náttúrufriðingarnevndir... Naturfredningsudvalg	263	400	400
15881	Føroyska málnevndin ..... Færøsk sprognævn	244	274	298
15895	Tónleikur og sangur ..... Musik og sang	700	600	600
15907	Ymiskir studningar: Diverse tilskud:			
	323012 Barnablað ..... Børneblade	50	60	120
	323037 Sjónleikur ..... Teater	465	500	2.200
323053	Til útgávu av barnabókum ..... Til udgivelse af børnebøger	900	1.000	1.500
323086	Sømdarpeningur til skald og listamenn (viðm.) ..... Hædersgaver til digtere og kunstnere (anm.)	190	215	225
323108	Lán og studn.gr. til bókaútgávu ..... Låne- og tilskudsf. til udg.af bøger.	300	300	300
323116	Skúlabókaútgáva..... Udg. af skolebøger	3.600	4.600	4.900
323124	Norðurlandahús ..... Nordens Hus	571	598	630
323132	Sjónleikarhús, í grunn (viðm.)..... Teater, henl. i fond (anm.)	100	100	100

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
323149	Fornminnissavn, í grunn (viðm.) Museum, henl. i fond (anm.)	2.000	1.000	1.000
323157	Útvarpssendistøðir í grunn ..... Radiosender, henl. i fondi	2.000	7.000	7.000
323165	Rakstur av Bókamiðsøluni.... Drift av Bókamiðsølan	315	448	448
323173	Orðabókaútgáva í grunn ..... Udgivelse af bøger, henl. i fond	225	250	250
323181	Ungdóms- og bygdahús í grunn (viðm.)..... Ungdoms- og bygdehus henl. i fond (anm.)	1.800	3.000	4.000
323228	Mentunargrunnurin (MFL) .... Kulturfonden (MFL)	1.300	1.300	2.000
323236	Listasøvn ..... Kunstsamlinger	400	400	500
323244	Savn í Hoyvík, í grunn (viðm.)..... Museum i Hoyvik, henl. i fond (anm.)	–	500	500
323269	Føroyskt-íslendskt-grønlendskt mentannarligt samstarv ..... Færøskt-islandsk-grønlandsk kulturelt samarbejde	–	200	200
323307	Fiskirannsóknarstovan, í grunn Fiskeribiol.laborat.i fond Nýggj grein.	3.500	2.000	12.000
323506	Bókasavn í grunn Bibliotek i fond			2.000

323331	Útvarp Føroya, tilskot til avdráttir av lánum	4.000	4.000	4.000
	Færøernes Radio, tilskud til afdrag på lån			
323348	Skjalasavn, í grunn (viðm.).	2.000	2.000	2.500
	Landsarkiv, i fond (anm.)			
323356	Kirkjubømúrurin, í grunn ...	500	1.000	1.275
	Muren i Kirkebø, i fond			
323364	Sjónvarp Føroya	626	650	4.800
	TV			
323372	Sjónvarp, í grunn (viðm.)...	7.000	7.000	8.000
	Fjernsyn i fond (anm).			
323468	Náttúrugripasavn í grunn (viðm.)	-	-	1.000
	Naturhistorisk museum i fond (anm.)			
323476	Fróðskaparsetrið í grunn (viðm.)	-	-	1.000
	Akademi i fond (anm.)			
373305	Landsstýrinum at ráða ..... yvir	352	450	250
	Landsst. at råde over			
		82.085	98.300	123.143

Viðmerking

Anmærkning

til § 15.15202/373106

Rakstrarstuðningur verður eisini at galda skúlabókasøvn.

Driftstilskud kan også ydes til skolebiblioteker.

til § 15.15907/323086

Sømdargávur fyri skaldskap og list:

	kr.
Janus Kamban	12.500
William Heinesen	12.500
Ingálvur av Reyni	12.500
Hans Jacob Højgaard	12.500
Robert Joensen	12.500
Eyvindur Mohr	12.500
Jens Pauli Heinesen	12.500
Bárður Jákupsson	12.500
Zacharias Heinesen	12.500

Hædersgaver vedrørende litteratur og kunst:

	kr.
Karsten Hoydal	12.500
Elinborg Lützen	12.500
Regin Dahl	12.500
Chr. Høj	12.500
Poulina Joensen	12.500
Hans J. Glerfoss	12.500
Rói Patursson	12.500
Frimod Joensen	12.500
Tróndur Patursson	12.500

til § 15.15907/323157

Játtan 7 mill. kr. um árið í 3 ár í grunn. Hetta er 2. árið.

Bevilling 7 mill. kr. om året i 3 år. henlæggelse i fond. dette er det 2. år.

til § 15.15907/323132
§ 15.15907/323149
§ 15.15907/323161
§ 15.15907/323244
§ 15.15907/323348
§ 15.15907/323372
§ 15.15907/323468
§ 15.15907/323476

Verður at veita saman við fíggjarnevndini.

Ydes sammen med finansudvalget.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 16.	Fiskivinna, sigling o.t.: Fiskeri, søfart o.l.:			
16018	Vrakarastovnur ..... Vragerinstitution	2.170	2.598	2.608
16106	Nautiskt royndarkamar ..... Nautisk prøvekammer	27	28	25
16208	Sjómansheim (viðm.)..... Sømandshjem (anm.)	263	450	375
16301	Vaktar- og bjarging-artænasta ..... Vagt- og bjergnings-tjeneste	16.206	18.312	17.313
16403	Royndir innan havbúnað .... Forsøg vedr. fiskeopdræt	1.943	2.228	2.250
16505	Prísásetingarnevndin fyri fisk ..... Udvalg til fastsæt-telse af fiskepriser	74	100	25
16607	Fiskivinnuráð ..... Fiskerirád	234	242	220
16612	Aliráðið ..... "Aliráðið"	808	1.381	1.000
16626	"Magnus Heinason" ..... "Magnus Heinason"	-	10.000	9.500

		Rokrskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
16904	Aðrir studningar: Andre tilskud:			
333017	Minstaløn og annar stuðul til fiski-vinnuna ..... Mindsteløn og anden støtte til fiskeri-erhvervet	261.500	260.000	325.000
333025	Stuðn.til grunnin til endurn. av fiski- og farmaskipaflotanum Tilskud til fonden til fornyelse af fiske- og fragtskibe	100.000	50.000	15.000
333033	Grindir ..... Grindefangst	26	50	
333058	Endurgjald fyri upprægging av gomlum fiskiskipum Erstatning for kondemnering af gamle fiskefartøjer	-	40.000	35.000
333074	Prakt.fiskirøyndir í grunn (viðm.)..... Praktiske fiskeri-forsøg i fond(anm.)	5.000	5.000	5.000
333082	Vaktarskip, í grunn (viðm.) Vagtskib, henl.i fond (anm.)	3.000	5.000	9.500
333104	Trygdargrunnur veiðumanna ..... Fiskernes garantifond	251	300	-
333199	Til upplýsing um grind Til oplysn.om grindehvalfangst	1.752	400	200
333208	Limagjald í fleirtjóðafelagsskapum Medlemskab i internationale fællesskaber			418

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
373305	Landsstýrinum at ráða yvir ..... Landsstyret at råde over	471	250	150
		393.725	396.339	423.584

Viðmerkingar

Praktiskar fiskiroyndir verða gjørdar í samráð við løgtingsins fiskivinnumevnd.

Verður játtað saman við figgjarnevndini.

Anmærkninger

til § 16.904/333074

Praktiske fiskeriforsøg udføres i samråd med lagtingets fiskeriudvalg.

§ 16.16904/333082

Ydes sammen med finansudvalget.

§ 17. Landbúnaður og matrikulering:
Landbrug og matrikulering:

17015	Landsdjóralæknaembætið ..... Landsdyrelægeembedet	1.368	2.536	3.799
17048	Landbúnaðarráðgevari ..... Landbrugskonsulent	322	377	402
17103	Útskifting og matrikulstova ..... Udskiftning og matrikelkontor	5.719	7.435	7.808
17205	Royndarstøð ..... Forsøgsstation	4.340	6.747	6.260
17219	Avloysingarskipan fyri mjólkaframleiðarar, í grunn Vikarordning for mælkeproducenter, i fond	312	464	580

		Rekrskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
17901	Aðrir stuðningar:			
	Andre tilskud:			
	343013 Húsdýraeldi	400	400	400
	Husdyreopdrætning			
	343021 Nýrækt v.m.	2.000	2.000	2.800
	Nyopdyrkning m.v.			
	343038 Rentustuðningur til			
	landbúnaðarlán	2.300	2.300	2.200
	Rentetilskud til			
	landbrugsl.			
	343046 Stuðningur til fjárfest-			
	ing í landbúnaðin			
	(viðm.)	6.000	6.000	6.000
	Finansieringstilskud			
	til landbruget (anm.)			
	343054 Stuðningur til mjólka-			
	framleiðslu.....	11.500	12.975	13.000
	Tilskud til mælke-			
	produktionen			
	343062 Stuðningur til sér-			
	hæfingarstöðva	400	400	400
	Tilskud til græssilopr			
	343079 Skógrækt landsins	1.000	1.000	1.890
	Landets skovrøgt			
	343087 Skeiðvirksemi.....	26	100	100
	Kursusvirksomhed			
	343117 Vaxtarhús í grunn...	1.000	1.000	1.000
	Drivhuse i fond			
	343125 Stuðn. til stráfóðurs (viðm.)	800	800	900
	Tilskud til stråfoder (anm.)			
	343133 Stuðn. til kjöts og eggja	2.450	2.930	3.190
	Tilskud til kødi og æg			
	343308 Bjargarækt.			250
	373305 Landsst.at ráða yfir..	808	100	100
	Landsst.at råde over			
		40.745	47.564	51.079

Viðmerkingar	Anmærkninger
til § 17.17901/343046	
Játtanin verður tó ikki at nýta til setihúsabygging.	Bevillingen må dog ikke anvendes til opførelse af beboelseshus.
til § 17.17901/344125	
Studningurin umfatar eisini í minsta lagi 4 kvígu- og/ella tarvaviðsetingar.	Støtten omfatter også mindst opdræt af 4 kvier og/eller tyre.

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 18.	Handil, iðnaður o.t.: Handel, industri m.v.			
18109	Arbeiðseftirlit ..... Arbejdstilsyn	1.987	2.899	2.248
18114	Arbeiðseftirlitið í Klaksvík Arbejdstilsynet i Klaksvik	421	616	604
18128	Arbeiðseftirlitið á Tvøroyri Arbejdstilsynet i Tvøroyri	190	615	599
18133	Arbeiðseftirlitið í Saltangará Arbejdstilsynet i Saltangará	-	722	879
18147	Arbeiðseftirlit í Vestmanna.. Arbejdstilsynet i Vestmanna	-	-	662
18152	Brandverjingarstøðin við Áir..... Brandmandingsstationen við Áir	339	372	200
18166	Brandeftirlit ..... Brandtilsyn	-	800	950
18202	Bileftirlit ..... Biltilsyn	3.275	3.110	1.863
18216	Radioeftirlit ..... Radiotilsyn	380	260	270

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
18235	Ráðið fyri ferðslutrygd Rådet for færdselssikkerhed	575	952	1.139
18268	Filmseftirlitið..... Filmstilsynet	368	431	450
18304	Skipaskrá og -uppmáling Skibsregistrering og opmåling.	1.064	885	854
18318	Semingsmannaskipan ... Forligsinstitution	169	125	125
18323	Kolagrevstur ..... Kulbrydning	630	1.000	800
18337	Læruráðið (viðm.)..... Lærerådet	317	1.456	1.510
18342	Skeiðvirksemi ..... Kursusvirksomhed	134	200	200
18356	Ferðamannamiðstøðin .. Turistcentralen	4.047	4.001	3.282
18361	Menningarstova ..... "Menningarstova"	2.000	2.000	2.630
18365	Javnstøðunevndin ..... Ligestillingsudvalget	-	150	300
18907	Aðrir studningar: Diverse tilskud:			
353026	Stuðul til íðnaðarframjandi endam.,í grunn (viðm.) Støtte til industrifremmende form., i fond. (anm.)	5.000	5.000	6.000
353034	At leggja í gistingarhúsgr. Henlæggelse i hoteifonden	600	600	600
353042	Til menningargrunn..... Til udviklingsfond	10.000	14.000	20.000

353067	Studningur til læruplass ..... Tilskud til lærepladser	3.386	2.000	2.000
353083	Til orkugrunn ..... Til energifond	3.000	1.000	1.000
353113	Føroysk vika í Danmark.. Færøsk uge i Danmark	700	-	-
353121	Skeiðvirksemið til vinnufeløg ..... Kursusvirksomhed Nyggj konto	213	200	200
353146	Ferðaendurgjald til læruplass Refusion af rejseudgifter til læreplas			400
373305	Landsst.at ráða yvir ... Landsst.at råde over	519	300	150
		39.614	43.694	50.016

Viðmerkingar:

Landsstýrið saman við fíggjarnevndini ráða yvir grunninum.

Anmærkninger:

Til § 18-18907/353026

Landsstyret sammen med finansudvalget disponerer over fonden.

	Rokniskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 19. Almannamál v.m.: Socialvæsen m.v.:			
19042 Andveikraverndin, bústovnar Åndssvageforsorgen, boliger	3.356	24.517	30.516
19056 Fólkapensjón ..... Folkepension	110.973	170.350	195.400
19061 Hækkingar í fólka- og avlamispensjónini ..... Forhøjelse i folke- og invalidepensionen	8.391	30.700	0

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
19075	Ellisheim ..... Alderdomshjem	3.185	71.178	76.500
19089	Vistarheim fyri pensiónistar.. Boliger for pensionister	-	4.828	5.000
19106	Avlamispensjón ..... Invalidepension	37.076	63.140	75.835
19208	Einkjubarnastyrkur v.m. ..... Børnebidrag til enlige forsørgere	1.466	3.227	3.225
19301	Einkjupensjón ..... Enkepension	1.424	1.558	1.565
19403	Vanlig forsorg ..... Almindelig forsorg	27.227	48.994	45.000
19519	Uppiskoytisveiting..... Tillægsydelse	-	692	755
19557	Barnaforsorg ..... Børneforsorg	7.572	14.827	16.300
19607	Heimahjálparskipanin ..... Hjemmehjælpsordningen	21.149	49.180	51.000
19659	Dagpeningsskipan ..... Dagpengeordning	27.443	77.112	80.000
19664	Bjálving av húsum hjá pensjónistum ..... Isolering af pensionistboliger	-	3.000	3.000
19752	Brennistudn.til pensiónistar ..... Brændselstilskud til pensionister	3.962	4.000	7.360
19802	Samsýning fyri at ansa óhjálpnum heima ..... Vederlag for at passe ældre hjemme	8.540	6.930	10.000

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
19850	Dagstovnar.....	-	29.819	37.922
	Daginstituticner			
19904	Ymsir studningar:			
	Forskellige tilskud:			
	363287 Vardar íbúðir til pensjónistar	-	-	4.000
	Beskyttede pensionistboliger i fond			
	363382 Mæðrahjálp	-	-	300
	Forlænget barselsorlov			
	363399 Kreppumiðstøð	-	-	100
	Krisecenter			
	363524 Barnastyrkur v.m.	17.383	48.300	66.000
	Børnetilskud m.m.			
	363532 Sertorsorg, bygging, í grunn	4.000	4.200	3.000
	Særforsorgen, bygn., i fond			
	363549 Kirkja í Keypmannahavn, í grunn	500	1.500	400
	Kirke i København, i fond			
	363557 Hús hjá Deyvafelagnum .	320	388	570
	Døves foreningshus			
	363565 Blindaheimið	-	600	1.200
	Blindehjemmet			
	363573 Andveikraverndin, føroyingar á stovnum í Danmark v.m.	-	14.056	13.464
	Åndsvageforsorgen, færinger i Danmark			
	363581 Andveikraverndin, eykaútreiðslur heima	-	270	-
	Åndsvageforsorgen, ekstraudgifter hjemme			

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
363598	Fráhaldsfelag Blákrossstovan Afholdsforening Blákrossstovan	175	200	132
363603	Styrkveiting ..... Understøttelse	300	225	150
363628	ALV ..... ALV	180	360	360
363636	Fráhaldsfeløg ..... Afholdsforeninger	425	450	450
363644	"Reyði Krossur" ..... "Røde Kors"	0	30	30
363652	Hjálpargrunnur fyri óar-beiðsførar fiskimenn .... Fonden for uarbejdsdygtige fiskere	300	400	400
363669	Felag teirra brekaðu ..... Foreningen for handikappede	700	760	1.060
363685	Húsalánsgrunnurin ..... Huslånefonden	15.000	27.000	40.000
363693	Kommunalur lánsgrunnur ... Kommunal lånefond	3.000	3.000	500
363707	Arbeiðsloysisgrunnur arbeið-arafelaga ..... Arbejdsforeningers arbejds-løsnedsfonds	341	500	800
363715	Føroyahús í København, í grunn ..... Føroyahús i København, hen-lagt i fond.	600	742	795
363731	Ansingar- og røktarheim, í grunn (viðm.)..... Opholds- og plejehjem. hen-lagt i fond (anm.)	10.000	18.782	12.000

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
363748	Íbúðagrunnur (viðm.)..... Boligfond (anm.)	1.500	3.000	2.000
363756	Rentustuðningur til húsa-bygging ..... Rentetilskud til beboelseshuse	758	300	1.000
363764	Vanlukkutryggingarráðið .. Ulykkesforsikringsrådet	242	932	510
363777	Næmingaheim i grunn (viðm.) Elevboliger henl. i fond (anm.)	3.000	5.829	6.000
363797	Ráðg.f.føroyingar í Danmark Rådg.f.færinger i Danmark	262	385	415
363819	Bústovnar fyri sinnisbrekað Institutioner for sindslidende	705	1.350	2.500
363827	Hjálpargrunnur móti alko-holmisnýtslu ..... Hjælpefond mod alkohol-misbrug	1.200	1.200	1.200
363835	Felagshús í Muuk (viðm.).. Foreningshus i Muuk (anm.)	125	125	125
363840	Menningarhjálp ..... Udviklingsbistand	2.108	5.000	5.000
363851	Landsfelag pensiónistanna Pensionisternes landsforening	-	100	150
373305	Landsstýrinum at ráða yvir Til landsstyret at råde over	454	300	200
19918	Skúlin á Trøðni ..... Skolen á Trøðni	3.363	13.093	16.550
		328.705	757.429	820.749

Viðmerking

til § 19.19904/363835

Játtan kr. 125.000 um árið yvir 4 ár. Hetta er 4. árið.

Anmærkning

Bevilling på kr. 125.000 om året i 4 år. Dette er 4. rate.

§ 19.19904/363287
§ 19.19904/363731
§ 19.19904/363748
§ 19.19904/363777

Verður játtað saman við fíggjarnevndini.

Bevilges sammen med finansudvalger.

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
§ 20.	Pensiónsútreiðslur: Pensionsudgifter:			
20013	Pensjónsútreiðslur Pensionsudgifter			
103558	Pensiónir ..... Pensioner	676	666	650
103612	Biðlaun ..... Ventepenge	1.562	1.500	415
103629	Tannstumannaeftirlønir Tjenestemandspensioner	3.964	4.329	4.200
		6.202	6.495	5.265
§ 21.	Effektivar veðhaldsbindingar í grunn: Effektive garantiforpligtelser henlagt i fond:			
21019	Effektivar veðhaldsbindingar í grunn ..... Effektive garantiforpligtelser henlagt i fond	80.000	50.000	105.000
		80.000	50.000	105.000
§ 22.	Aðrar og óvissar útreiðslur: Andre og uvisse udgifter:			
22104	Aðrar og óvissar útreiðslur: Andre og uvisse udgifter:			
203507	Umboðan ..... Representation	1.229	1.000	1.500
253704	Útreiðslur av vali ..... Udgifter vedrørende valg	83	100	100

		Roknskapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
253753	Dóms- og løgreglumál	36	25	35
	Retsvæsen og politi			
253808	Stuðningur til politiska upplýsing v.m. (viðm.) ..	2.000	3.000	3.000
	Tilskud til politisk oplysningsarbejde mm.(anm.)			
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	2.462	1.000	200
	Til landsstyret at råde over			
		5.810	5.125	4.835

Viðmerkingar

Til § 22.22104/253808

Hesin peningur verður eftir umsókn býttur millum politisku flokkarnar, ið attaná hvørt løgtingsval eru umboðaðir á tingi og í mun til flokkanna atkvøðutal.

Anmærkninger

Dette beløb bliver efter ansøgning fordelt mellem de politiske partier, der efter hvert lagtingsvalg er repræsenteret i lagtinget og i forhold til partiernes stemmetal.

§ 23. At leggja í ymsar grunnar v.m.:
Henlæggelse til forskellige fonds m.v.:

23104	At leggja í ymsar grunnar v.m.			
	Henl. til forsk. fonds m.v.			
383015	Avlopið hjá apotekinum			
	lagt í apotekaragrunnir.	2.298	+1.585	3.026
	Apotekets overskud henlagt til apotekerfonden			
383058	Avlopið hjá Telefonverk..	26.081	26.030	39.825
	Telefonvæsenets overskud			
383064	Avlop hjá Postverki Føroya	+5.288	+6.395	+5.385
	Postvæsenets overskud			
383102	Avlopið hjá útvarpinum...	199	0	0
	Radiofoniens overskud			
383119	Avlopið hjá Sjónvarpinum.	+1.610	+625	+625
	Fjernsynets overskud			

		Rokn.skapur 1987 kr. (1.000)	Játtan 1988 kr. (1.000)	Játtan 1989 kr. (1.000)
383151	Til kirkjugrunnin ..... Til kirkefonden	3.700	3.900	3.900
383168	Cljugrunnur ..... Cliefond	93.367	65.000	105.000
		118.747	86.295	145.741
§ 24.	Burturleggingar til avdráttir av lánum: Herlæggelser til afdrag på lån:			
24302	Burturleggingar í grunn til avdráttir ..... Herlæggelser i fond til afdrag	27.400	21.544	4.000
§ 25.	Avskrivingar: Afskrivninger:			
25401	Avskrivingar, bygningar og anlegg ..... Afskrivn., bygn. og anlæg	51.286	58.603	64.305
§ 26.	Ymsar ognarútreiðslur: Diverse ejendomsudgifter:			
26305	Ymsar ognarútreiðslur ... Diverse ejendomsudgifter	525	300	700
§ 27.	Reguleringarkonto Reguleringskonto			
27005	Reguleringarkonto (viðm.) Reguleringskonto (anm.)	0	0	50.000

Viðmerkingar:

Til § 27-27005

Landstýrið saman við fíggjarnevnini ráða yvir hesi konto

Anmærkninger:

Landsstyret sammen med finansudvalget disponerer over fonden.

Samanlagdar útreiðslur .. Samlede udgifter	1.855.581	2.758.461	3.153.043
Munur/Balance	282.727	855	3.246
	2.138.308	2.759.316	3.156.289

Flytingar á ognar- og kapitalkonti landskassans
á fíggjarárinum 1989

Bevægelser på landskassens formue- og kapitalkonti
i finansåret 1989

	Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 30. Kassakonto	351.229.000	
Kassekonto		
	351.229.000	
§ 31. Virðisbrøv:		
Værdipapirer:		
1. Teknan av partapeningi í felag		750.000
Aktietegning i selskaber		
		750.000
§ 32. Útlán:		
Udlån:		
1. Kommunur:		
Kommuner		
1. Avdráttir	75.000	
Afdrag		
2. Ymisk lán:		
Diverse lån:		
1. Avdráttir	9.000.000	
Afdrag		
2. Avskrivingar		
Afskrivninger		
3. Kurslán:		
Kurslån:		
1. Avdráttir	500.000	
Afdrag		
4. Útgoldin lán		7.000.000
Udbetalte lån		
	9.575.000	7.000.000

		Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 33. Inntøkueftirstøðir: Indtægtsrestancer:	(1.000 kr.)		
1. Skattur: Nýggj álíkning	1.100.000		
Skat: Ny påligning			
Skattur: Goldin eftirstøða	1.045.000		55.000.000
Skat: Betalte restancer			
2. Sjúkrahús:			
Sygehuse:			
Gjøld.....	1.000		
Takster			
Goldið	950		50.000
Betalt			
3. Avdráttar- og rentueftirstøðir:			
nýggjar			12.000.000
Afdrags- og renterestancer			
nye			67.050.000
§ 34. Aktiv tilhoyrandi grunnum:			
Aktiver tilhørende fonde:			
1. Apotekaragrunnurin:			
Apotekerfonden:			
1. Rentur			500.000
Renter			
2. Yvirskot		3.026.000	
Overskud			

	Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
2. Grunnurin til endurnýggjan av fiski- og farmaskipaflotanum: Fonden til fornyelse af fiske- og fragtskibsflåden:		
1. Rentur ..... Renter		2.500.000
2. Burturlagt samb. rakstrarætlan ..... Henlagt i henhold til driftsbudget		15.000.00
3. Avskrivað studningslán ..... Afskrevet på tilskudslån	5.000.000	
4. Aðrar útreiðslur..... Andre udgifter	15.000.000	
3. Byggigrunnur strandferðslu landsins: Byggefonden for kystfarten:		
1. Rentur ..... Renter		0
2. Burturlagt samb. rakstrarætlan ..... Henlagt i henhold til driftsbudget		3.000.00
3. Nýtt úr grunninum ..... Forbrug af fonden	0	
4. Aðrir grunnar: Andre fonds:		
1. Rentur og gjøld ..... Renter og bidrag		1.100.00
2. Játtan ..... Bevilling		640.000.00
3. Birding av fyrr játtaðum peningi ..... Båndlægning af tidligere bevillinger		0
4. Nýtt úr grunnunum ..... Forbrug af fondene	400.000.000	
	423.026.000	662.100.00

	Inntøkur Indtægter kr.	Útg Udgifter kr.
§ 35. Aktiv hjá deponentum:		80.000.00
Aktiver tilhørende deponenter:		50.000.000
§ 36. Millumrokning til góðar:		
Mellemregning til gode:		
1. Kommunur:		
Kommuner:		
1. Inngoldið	8.000.000	
indbetalt		
2. Útlagt		9.000.000
Udlagt		
2. Strandferðslan:		
Kystfarten:		
1. Útlagt		55.800.00
Udlagt		
2. Undirskot sambært rakstrarætlan	55.800.000	
Underskud i henhold til driftsbudget		
3. Telefonverkið:		
Telefonvæsenet:		
1. Yvirskot samb. rakstrarætlan		39.825.00
Overskud i henhold til driftsbudget		
4. Útvarpið:		
Radiofonien:		
1. Undirskot sambært rakstrarætlan		0
Underskud i henhold til driftsbudget		

	Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
5. Matrikulstovan: Matrikelkontoret:		
1. Útlagt		8.700.000
Udlagt		
2. Flutt frá rakstrarætlan	8.608.000	
Overførsel fra driftsbudget		
6. Veðhald: Garantiforpligtelser:		
1. Útlagt		45.000.000
Udlagt		
2. Avskrivað upp á fyrr goldin útlegg 40.000.000		
Afskrevet på tidl. indfriede gældsforpligtelser		
3. Goldið upp á fyrr goldin útlegg.....	0	
Betalt på tidligere indfriede garantiforpl.		
	112.408.000	158.325.000

§ 37. Fastar ognir og anlegg:
Fast ejendom og anlæg:

1. Sethús: Beboelseshuse:		
1. Avskrivingar.....		50.000
Afskrivninger		
2. Ognir í almennari nýtslu: Ejendomme i offentligt brug:		
1. Avskrivingar		3.300.000
Afskrivninger		

	Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
	(1.000)	
3. Hús í gerð: Bygninger under opførelse:		
1. Løgtings- og landsfyrisitingarhús ..... Lagtings- og administrationsbygning Grunnurin ..... Fonden	0 2.000.000	 2.000.000
4. Anlegg: Anlæg:		
1. Avskrivingar ..... Afskrivninger	1.000.000	
2. Vegir og havnir o.a. fíggjað við lántøku ..... Veje og havne finansieret ved optagelse af lån	34.400.000	0
	40.750.000	2.000.000
§ 38. Skip: Skibe:		
1. Bygging av rannsóknarskipi ..... Bygning af et havundersøgelsesskib Grunnurin ..... Fonden	0 0	
2. Bygging av strandfaraskipi ..... Bygning af kystfartøj Grunnurin ..... Fonden	0 0	
3. Avskrivingar ..... Afskrivninger	16.500.000	
	16.500.000	

	Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 39. Millumrokning við nýtt fíggjarár: Mellemregning ved nyt finansår:		
1. Inngjaldingar í 1988 viðv. 1987 Indbetalinger i 1988 vedr. 1987	150.000.000	
2. Útgjaldingar í 1988 viðv. 1987 Udbetalinger i 1988 vedr. 1987		350.000.00
	150.000.000	350.000.000
§ 40. Millumrokning, skuld: Mellemregning, gæld:		
1. Ymisk millumrokningarkonti vaksa við Diverse mellemregningkonti forøges med	1.000.000	
	1.000.000	
§ 41. Lán: Lån:		
1. Avdráttur ..... Afdrag		58.000.000
2. Nýupptikin lán ..... Nyoptagne lån		0
		58.000.000
§ 42. Deposita: Deposita:		
1. Goldið av deponentum ..... Betalt af deponenter	15.000.000	
	15.000.000	

	Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
§ 43. Grunnar:		
Fonds:		
1. Apotekaragrunnurin:		
Apotekerfonden:		
1. Rentur	500.000	
Renter		
2. Yvirskot		3.026.000
Overskud		
2. Grunnurin til endurn. av fiski- og farmaskipaflotanum:		
Fonden til fornyelse af fiske- og fragtskibeflåden		
1. Rentur	2.500.000	
Renter		
2. Játtan	15.000.000	
Bevilling		
3. Avskrivað studningslán		5.000.000
Afskrevet tilskudslán		
4. Aðrar útreiðslur		15.000.000
Andre udgifter		
3. Byggigrunnur strandferðslu landsins:		
Byggefond for kystfarten:		
1. Rentur	0	
Renter		
2. Játtan	3.000.000	
Bevilling		
3. Nýtt úr grunninum		0
Forbrug af fonden		
4. Kirkjugrunnurin:		
Kirkefonden:		
1. Játtan	3.900.000	
Bevilling		
2. Nýtt úr grunninum		3.900.000
Forbrug af fonden		

	Inntøkur Indtægter kr.	Útreiðslur Udgifter kr.
5. Øðrir grunnar: Andre fonds:		
1. Rentur og gjøld ..... Renter og bidrag	1.100.000	
2. Játtan ..... Bevilling	640.000.000	
3. Nýtt úr grunninum ..... Forbrug af fondene		400.000.000
	666.000.000	426.926.000
§ 44. Burturleggingar og avskrivingar: Henlæggelser og afskrivninger:		
1. Avskrivingar- og avdráttargrunnur viðv. lánspeningi: Afskrivnings- og henlæggelsesfond vedrørende lån:		
1. Avdráttarburturleggingar viðv. lánum ..... Henlæggelser vedr. afdr. på lån	4.000.000	
2. Avskrivingar, studningslán ..... Afskrivninger, tilskudslån		5.000.000
Avskrivingar, vega- og annur anleggsbygging .... Afskrivninger vedr. veje og andre anlægsarbejder		34.000.000
	4.000.000	39.000.000
§ 45. Kapitalkonti: Kapitalkonti:		
1. Yvirskot telefonverksins ..... Telefonvæsenets overskud	39.825.000	
2. Undirskot útvarpsins ..... Radiofoniens underskud		0
3. Yvirskot frá rakstrarætlanum ..... Overskud på driftsbudgetter	3.246.000	
	43.071.000	0

FIGGJARNEVNDIN, 15. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen — Torbjørn Poulsen — Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen — Flemming Mikkelsen — Jørgen Thomsen

Vilhelm Johannesen

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

løgtingsmál nr. 64/1988 (vetrarting): Fíggjarløgtingslóg 1989.

Ein samd fíggjarnevnd mælir til, at

§ 16, konto 16904-333104 Trygdargrunnur veiðimanna

Játtaðar verða .....kr. 1.080.000,-

FÍGGJARNEVNDIN, 21. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

løgtingsmál nr. 64/1988 (vetrarting): Fíggjarløgtingsló́g 1989.

§ 22, konto 22104-253808 Stuðningur til politiska upplýsing v.m. (viðm.)
Játtaðar verða .....kr. 4.000.000,-

Á FØROYA LØGTINGI, 21. mars 1989.

Jørgen Thomsen Svend Aage Ellefsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 14. februar 1989

F. L. j. nr. 1198-2-72
(at tilskila í svari)

Tlf. 11080 Telex 81310 Hmmm fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

KA/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 65/1988: Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1989.

U p p s k o t

til

samtykt

Vísandi til § 1 í Løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir Løgtingið viðløgdu skipan, dagfest 6. desember 1988 um sínamillum fiskirættindi í 1989 millum Føroyar og EF.

Viðmerkingar:

1. Tann 6. desember 1988 var 2. samráðingarumfar millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EF-nevndina í Bruxelles um sínamillum fiskirættindi í 1989 millum Føroyar og EF. Úrslitið av samráðingunum er hjálagda skipan, undirritað í Bruxelles 6. desember 1988.
2. Sáttmálin fyri 1989 javnvigar á eitt sindur lægri støði í toskavirði sammett við sáttmálan fyri 1988.
3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1989 av ósløgdum fiski eru hesar:

Hjá EEC-skipum á landleiðini:

Samlaða nøgdin av botnfiski, svartkjafti og makreli verður í 1989 (1988-nøgdin í klombrum):

500 tons av roski og hýsu (500 tons)
2.500 - - spsa (2.400 tons)
7.150 - - kongafiski (7.400 tons)
3.600 - - blálongu og longu (3.600 tons)
1.000 - - flatfiski (svartkalvi íroknaður) (1.000 tons)
500 - - ymiskum fiskaslógum (500 tons)
25.000 - - svartkjafti (25.000 tons)
4.370 - - makreli (5.000 tons).

Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu í íðnaðarfiskiskapi; í 1988 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu á havleiðunum vestanfyri Skotland (í 1988: 940 tons).

(b) 5.250 tons av tí vestara makrelstovninum; í 1988 var loyvt at veiða 6.000 tons. Eftir at sáttmálin er undirskrivaður, hevur EF-nevndin boðað landsstýrinum frá, at Føroyar fáa loyvi at veiða 1.000 tons av kvotuni fyri 1989 eystan fyri 40V, vísandi til § 3, stk. 4 í váttaðu frásøgnini frá samráðingunum í Bruxelles.

(c) 7.000 tons av rossamakreli (í 1988: 9.250 tons).

(d) 9.000 tons av hvítingsbróður, 9.000 tons av nebbasild og 2.000 tons av brislingi; 1988-tølini vóru tey somu. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróður (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan) og nebbasild, treytað av, at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 20.000 tons (í 1988 20.000).

(e) 660 tons av sild vestan fyri Skotland, (í 1988 600 tons).

(f) 62.000 tons av svartkjafti (1988 60.000 tons). Í veiðuni av svartkjafti er loyvt at hava hjáveiðu av gullaksi sum ikki slepst undan.

(g) 500 tons av sild í Skagerak; sama nøgd sum í 1988.

(h) 125 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3 PS (St. Pierre og Miquelon) (í 1988 var nøgdin 150 tons).

Hjá førovskum skipum í grønlendskum sjógvi (smb. § 1 (3)) í fiskisáttmálanum millum EF og Grønland.

Í 1989 eru kvotur í grønlendskum sjógvi tær somu sum í 1988 nevniliga:

(i) 475 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (í 1988 sama nøgd). 675 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1988 sama nøgd).

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1988 vóru nøgdirnar tær somu.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønlandi) (í 1988 var nøgdin tann sama).

(l) Loyvt er í 1989 at veiða 10.000 tons av loðnu við Eysturgrønland (í 1988 sama nøgd).

Vísandi til § 3 í váttaðu frásøgnini er vert at leggja til merkis, at grundarlagið undir semjuni um makrel nú er bundið at eini heildarkvotu, avtalað millum Noreg, EF og Føroyar. Fer heildarkvotan upp, so skulu Føroyar eisini fáa størri part. Við hesum er samstundis "ognarrættur" Føroya til ein part av vestanmakrelinum staðfestur, 3,5% av heildarkvotuni hoyra til Føroyskt fiskiøki. Samstundis er fiskimøguleiki okkara á EF-øki eisini ásettur sum partur av heildarkvotuni. Fyri fyrstu ferð hava føroysk skip fingið loyvi at veiða part av makrelinum evstan fyri 4ow.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/

/ Kjartan Hoydal

Váttað frásøgn um samráðingar um fiskiskap millum EF og Føroyar í Bruxelles 6. desember 1988.

1. Ein sendinevnd, umboðandi Føroya Landsstýri við harra Kjartan Hoydal sum formanni, og ein sendinevnd umboðandi felagsskapin við harra Henrik Schmiegelow sum formanni, hittust í Bruxelles 6. desember 1988 til samráðingar um sínamillum fiskiskap í 1989. Fundurin var framhald av einum fundi hildnum frammanundan í Bruxelles.

2. Sendinevndirnar samdust um at viðmæla myndugleikum teirra, at tær kvotur fyri 1989, ið eru upprknaðar í hjálagda skjali, skulu galda fyri skip hjá einum av pørtunum, sum fiska í sjógvi hjá hinum partinum.

3. Partarnir umrøddu røktina av og veiðu av vestara makrel stovninum, og vóru samdir um at tiltøk áttu at verið gjørd, sum avtalað, fyri at varðveita stovnin.

   Førovski parturin greiddi frá ætlan síni at avmarka veiðuna í 1989 av vestara makrelstovninum í føroyskum sjógvi og føroyska veiðan í altjóða sjógvi í norska havinum (ICES øki II a) til í mesta lagi 19.200 tons, íroknað 4.370 tons til EF í føroyskum sjógvi.

   Hesa nøgd hava føroyingar góðkent útfrá einum EF TAC fyri ICES økini V b (EF øki) VI, VII, VIII (tó ikki VIII c), XII, XIV uppá 349.000 tons fyri 1989. Føroyar tilskila sær rætt til broytingar, um TAC verður broytt frá nevndu upphædd.

   Um EF avger at teirra fiskimenn kunnu fiska partar av teirra kvotu, sum er ásett til EF makrelveiðu í ICES øki II (uttan EF øki), V b (EF øki), VI, VII, VIIIa, b, d, e, XII og XIV í EF-økinum hjá ICES IV a norðanfyri 59°N, so skulu føroyskir fiskimenn hava loyvi til at veiða lutfalsliga somu nøgd av føroysku kvotuni uppá 5.250 tons í EF-økinum hjá ICES IV a norðanfyri 59°N.

   Partarnir vóru samdir um at ásettu veiðunøgdirnar fyri 1989 viðvíkjandi vestara makrelinum var ein ad hoc avtala fyri 1989 og ikki prejudiserar framtíðar avtalur.

4. EF-sendinevndin gjørdi vart við, at EF seinastu árini ikki hevði veitt nógv av teskt og hýsu í føroyskum øki í mun til kvotuna. Sendinevndin kom beinleiðis við uppskoti um broytingar í føroysku fiskireglunum, soleiðis at EF-fiskimenn betri kundu veiða hesa kvotu. Førcyska sendinevndin lovaði at viðgera uppskotið til fulnar og greiða EF frá úrslitinum.

5. Sendinevndirnar samdust um, at um annar parturin ætlar at setai gildi ella broyta fiskireglur, ið koma at galda fyri fiskifør hjá hinum partinum, skal hann boða hinum partinum frá slíkum ætlanum við minst 14 daga ávaring. Samráðingar skulu verða, um annar parturin ynskir tað.

6. Partarnir samdust um at loyvisreglurnar, sum skulu galda fyri 1989 skulu vera samsvarandi frásøgn dagfest 5. desember 1988 viðvíkjandi loyvum.

7. Samráðingarnevndirnar samdust um, at hvør partur skal senda hinum partinum mánaðarhagtøl, og um annar parturin heldur tað vera neyðugt, vikuhagtøl fyri veiðu hjá skipum hjá hinum partinum á sínum fiskiøki.

Bruxelles, 6. desember 1988

Føroyska sendinevndin	EEC-sendinevndin
Kjartan Hoydal (sign.)	Henrik Schmiegelow (sign.)

Kvotur.

1. Hvør parturin skal láta kvotur, sum nevndar eru niðanfyri, til hin partin á sjóøki sínum:

1.1. Kvotur hjá EEC-skipum á føroyskum sjóøki.

Fiskasløg	Øki	Nøgd (tons)
Toskur og hýsa	Vb	500
Upsi	Vb	2.500
Kongafiskur	Vb	7.150
Blálonga og longa	Vb	3.600
Flatfiskur	Vb	1.000 (1)
Svartkjaftur	Vb	25.000
Makrelur	Vb	4.370
Onnur fiskasløg	Vb	500

(1) fróknað svartkalva

1. 2. Kvotur hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi

Fiskasløg	Fiskioki ICES-øki ella NAFO-øki	Møgd (tons)
Longa, brosma og blálonga	VIa (2) VIb	800 (1)(10)
Blálonga	VIa(2), VIb	940 (7)
Makrelur	VIa(2),VII,e,f,h	5.250
Síld	VIa(2)	660
Rossamakrelur	IV,VIa(2),VIIe,f,h	7.000
Hvítingsbróður	IV,VIa(2)	9.000(3)(4)(8)
Brislingur	IV,VIa(2)	2.000
Nebbasild	IV	9.000(3)(8)
Svartkjaftur	VIa(2),VIb,VII(5)	62.000(9)
Annar botnfiskur (bert hjáveiða)	IV,VIa(2)	400
Síld	IIIaN(Skagerak)(6)	500
Hemari	Alt EEC-økið (undantikið NAFO 3 PS)	125 (1)

(1) Veiðast við línu.

(2) Norðan fyri 56°30'N.

(3) Hvør av hesum kvotunum kann yvirfiskast við í mesta lagi 10.000 tonsum, treytað av at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 20.000 tons.

(4) Av hesum kunnu í mesta lagi 6.000 tons fiskast í ICES-økinum VIa norðan fyri 56°30'N, treytað av at EEC eftir áheitan fær gjølligar upplýsingar um veiðunøgd og samanseting av hjáveiðu.

(5) Vestanfyri 12°V.

(6) Avmarkað vesturoftir av einari linju frá Hanstholm-vita til Lindenes-vita, suðureftir av einari linju frá Skagen-vita til vita í Tistlarna og haðani til nærmastu strond í Svøríki.

(7) Veiðast við troli.

(8) Veiðan av hvitingsbróður og neðbasild kann hava í sær hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan.

(9) Veiðan av svartkjafti kann hava í sær hjáveiðu av gullaksi, sum ikki slepst undan.

(10) Av hesum kunnu sum hjáveiða av øðrum sløgum veiðast upp til 20% í nøgd av hvørjum skipi sær. Hetta er loyvt í ICES øki VIa og b. Hóast hetta kann prosentparturin verða størri í teir fyrstu 24 tímarnar av túrinum á ávísum fiskiøki. Samlaða hjáveiðan av øðrum fiski í VIa og VIb má ikki vera meir enn 75 tons.

1.3. P.M. Kvotur hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi smb. § 1, stk. 3 í fiskiveiðusáttmála millum EEC og Grønland.

Fiskaslóg	Fiskiøki: ICES-øki ella NAFO-øki	Nøgd tons
Rækjur	NAFO 1 (1)	475
Rækjur	XIV	675
Svartkalvi	NAFO 1	150
	XIV	150
Kongafiskur	XIV	500
Lodna	XIV	10.000

(1) Sunnan fyri 68°N.

AGREED RECORD OF CONCLUSIONS OF FISHERY CONSULTATIONS BETWEEN THE EUROPEAN ECONOMIC COMMUNITY AND THE FAROE ISLANDS
BRUSSELS, 6 DECEMBER 1988

1. A delegation of the European Economic Community headed by Mr. Henrik SCHMIEGELOW and a delegation representing the Home Government of the Faroe Islands headed by Mr. Kjartan HOYDAL met in Brussels on 6 December 1988 for consultations on mutual fisheries relations in 1989. The meeting was a continuation of a previous meeting in Brussels.

2. The delegations agreed to recommend to their respective authorities that the allocations for 1989 set out in the Annex should be made to vessels of either Party fishing in the waters of the other Party.

3. The Parties discussed management issues in respect of the western mackerel stock, and agreed that measures were to be taken, as appropriate, to promote effective conservation and exploitation.

The Faroese Party informed about the undertaking that total catches in 1989 of Western mackerel in its fishery zone and Faroese catches in international waters in the Norwegian Sea (ICES area IIa) will be kept within a limit of 19.200 t including 4.370 t allocated to the Community in the Faroese fishing zone.

This figure is agreed by the Faroe Islands in the context of a Community TAC for ICES zones Vb (EC zone), VI, VII, VIII (except VIIIc), XII, XIV of 349.200 t for 1989. The Faroese Party reserves its position in case that TAC varies from that level.

Should the Community decide that Community fishermen may fish part of their quota fixed for the Community's mackerel fishery for the ICES sub-areas II (except EEC zone), Vb (EEC zone), VI, VII, VIIIa, b, d, e, XII and XIV in the Community zone in ICES division IVa North of 59°N, Faroese fishermen shall be allowed to take a similar proportion of the Faroese quota of 5.250 t in the Community zone in ICES division IVa North of 59°N.

The Parties noted that the catch levels set for 1989, in respect of Western mackerel constitute an ad hoc arrangement for 1989, it being without prejudice to future arrangements.

4. The Community delegation pointed to the poor utilization of its cod and haddock quota in the Faroese zone in past years and made certain specific proposals for changes in Faroese fisheries regulations with a view to increase the fishability of this quota by Community fishermen. The Faroese delegation undertook to consider these proposals carefully and inform the Community about the result.

5. The delegations agree that a Party intending to introduce or to amend fishery regulations applicable to vessels of the other Party shall inform the latter of such intentions with a notice of at least two weeks. Consultations shall be held if so requested by either Party.

6. The delegations agree that the licensing system in force in 1989 shall be in accordance with the attached Agreed Record of 6 December 1988 on licences.

7. The delegations agree that each Party shall supply the other with monthly and, where deemed necessary by either Party, weekly catch statistics of fishing by vessels of the other Party in its zone.

Brussels, 5 December 1988

Mr. Henrik SCHMIEGELOW
Delegation of the
Community

Mr. Kjartan HOYDAL
Delegation of the
Faroe Islands

ANNEX I - A. 1

QUOTAS

1. Each Party shall open the catch quotas indicated hereunder for the other in its fishery zone :

1.1. Quotes for Community vessels fishing in the Faroese zone

SPECIES	ICES-division	Quantity (tonnes)
Cod	Vb	500
Haddock	Vb	2.500
Saithe	Vb	7.150
Redfish	Vb	3.600
Blue ling and ling	Vb	1.000 (1)
Flatfish	Vb	25.000
Blue whiting	Vb	4.370
Mackerel	Vb	500
Other species		

(1) Including Greenland halibut

1.2. Quotas for Faroese vessels fishing in the Community zone

SPECIES	Fishing zones (ICES division or NAFO zone	Quantity (tonnes)
Ling, tusk and blue ling	IIa(2),VIb	800 (1)(10)
Blue ling	VIa(2),VIb	940 (7)
Mackerel	VIa(2),VIIe,f,h	5.250
Herring	VIa(2)	660
Horse mackerel	IV,VIa(2),VIIe,f,h	7.000
Norway pout	IV,VIa(2)	9.000 (3)(4)(8)
Sprat	IV,VIa(2)	2.000
Sandeel	IV	9.000 (3)(8)
Blue whiting	IIa(2),VIa,VII(5)	62.000 (9)
Other white fish (by-catches only)	IV,VIa(2)	400
Herring	IIIaN (Skagerrak) (6)	500
Porbeagle	Entire Cty zone except NAFO 3 PS	125 (1)

(1) To be fished by long line.

(2) North of 56°30'N.

(3) Each of these quotas may be exceeded by a maximum of 10.000t provided that the total catches of Norway pout (including blue whiting), sandeel and sprat do not exceed 20.000 t.

(4) Of which maximum 6.000 t may be fished in ICES VIa north of 56°30'N subject to the provision or request by the EEC of details of the quantity and composition of any by-catch taken.

(5) West of 12°00'W.

(6) Limited in the west by a line drawn from the lighthouse of Hanstholm to the lighthouse of Lindesnes and in the south by a line drawn from Skagen lighthouse to the lighthouse of Tistlarna and from there to the nearest coast of Sweden.

(7) To be fished by trawl.

(8) Catches of Norway pout and sandeel may include unavoidable by-catches of blue whiting.

(9) Catches of blue whiting may include unavoidable by-catches of argentine.

(10) Of which an incidental catch of other species of 20% per ship, at any moment, is authorized in ICES subareas VIa and b. However, this percentage may be exceeded in the first 24 hours following the beginning of the fishing on a specific ground. The total incidental catch of other species in VIa and VIb may not exceed 75 tonnes.

1.3 P.M. Quotas for Faroese vessels fishing in Greenland waters (cf.Article 1.3) of EC/Greenland Fisheries Protocol)

Species	Fishing Zones : ICES Division or NAFO Zone	Quantity (Tonnes)
Northern deepwater Prawn (Pandalus borealis)	NAFO : (1) XIV	675 675
Greenland Halibut	NAFO : XIV	150 150
Redfish	XIV	500
Capelin	XIV	10 000

(1) South of 68°N

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 65/1988 (vetrarting): Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1989.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 16. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 23. februar beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja tað.

MARKNAÐARNEVNDIN, 23. februar 1989.

Karin Kjølbro — Olaf Olsen — Lasse Klein

Pauli Ellefsen — Atli P. Dam — Suni Jacobsen

Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 14. februar 1989

F. L. j. nr. 1500-1-11-3
(at tilvísa í svari)

Tlf. 11000. Telex 81310 tinghs fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, laygardag stongt

KjH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 66/1988: Loyvi til fiskifør heimahovrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóðki Føroya í 1989.

U p p s k o t

til

samtykt

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðlógdu semju dagfest 31. januar 1989 um sínamillum fiskirættindi í 1989 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR).

Viðmerkingar:

Heilt síðan at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hevur Týska Demokratiska Lýðveldið biðið um og fingið loyvi til at reka svartkjaftaveiðu í føroyskum sjógvi.

Í 1980 byrjaði føroyskur toskafiskiskapur í Eystrasalti og varð tá sett eum treyt fyri fiskiskapin hjá skipum úr Týska Demokratiska Lýðveldinum undir Føroyum, at føroyingar fingu eina toskakvotu á teirra havøki.

Í 1980 fingu føroyingar eina kvotu uppá 400 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 2.800 tons av svartkjafti undir Føroyum.

Í 1981 fingu føroyingar eina kvotu upp á 800 tons av toski á landleiðini hjá DDR og DDR eina kvotu uppá 6.600 tons

av svartkjafti undir Føroyum. Loyvda skipatalið hjá DDR varð samstundis hækkað úr 2 í 3. Samstundis varð skipatalið hjá føroyingum hækkað úr 2 í 3. Av kvotuni uppá 800 tons av toski kundu 400 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.d, upp í 600 tons av síld.

Í 1982 fingu førovingar eina kvotu uppá 975 tons av toski á landleiðini hjá DDR og DDR fekk eina kvotu uppá 8.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av tí hækkaðu kvotuni kundi 800 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 750 tons av síld. Talið av førovskum skipum varð samstundis hækkað úr 5 í 7.

Í 1983 fingu førovingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av síld. Føroyska skipatalið varð samstundis hækkað úr 7 í 10.

Í 1984, 1985 og 1986 fingu førovingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundi 650 tons verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av síld. Føroyska skipatalið var tó í 1985 hækkað úr 10 í 15 og DDR fekk skipatalið 4 før.

Føroyska toskakvotan var í 1987 hin sama sum í 1984, 85 og 85, nevniliga 1.300 tons. Av hesi kvotu kunnu 650 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av síld. Talið á føroyskum skipum var óbroytt, 15 før. Av hesum førum hava í mesta lagi 12 loyvi at fiska samstundis á landleiðini hjá DDR.

DDR fekk í 1987 loyvi at veiða 10.000 tons av svartkjafti og fyri fyrstu ferð kunnu í staðin fyri 1.000 tons av svartkjafti 1.500 tons av makreli verða veidd av DDR-førum. Skipatalið var óbroytt.

Vanliga hava føroysk fiskifør havt ógvuliga lítlan áhuga fyri at fiska í DDR-sjógvi. Hóast tað at rættiliga stórar nøgdir verða veiddar av toski í vestara partinum av Eystrasalti, tykist hetta ongantíð at hava havt áhuga føroyinga, helst tí fiskimøguleikarnir hava verið ríkiliga góðir eystanfyri.

Av hesum orsøkum og eisini tí at annað samstarv sambært § 1, stk. 2 í fiskivinnusáttmálanum millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið frá 14. mai 1986, varð farið fyri skeytið, varð støðið í sínamillum fiskirættindum fyri 1988 lækkað.

Svartkjaftakvotan hjá DDR varð lækkað niður í eina helvt og toskakvotan hjá Føroyum varð lækkað niður í 58% av 1987-kvotuni. Annars vóru treytirnar fyri umbýti við síld og makrel sum árið fyri. Við hesum góðtók DDR eisini í 1988 at gjalda meira fyri svartkjaftin. Býtislutfallið millum tosk og svartkjaft broyttist frá 7,69 kilo av svartkjafti fyri hvørt kilo av toski til 6,67 kilo.

Í 1988 hendi so tað, at knappliga høvdu eysturtjóvarbátarnir áhuga fyri at veiða í DDR-sjógvi. Kvotan varð uppfiskað og neyðugt varð at biðja DDR um eina eykakvotu uppá 100 tons. Hendan varð játtað uttan krav um mótrokning. Eisini hevur DDR givið loyvi til á conto fiskiskap til sáttmáli er gjørdur fyri 1989.

Aftur ímóti hevur DDR í 1988 bert nýtt lítlan part av síni kvotu uppá 5.000 tons, ikki meir enn 1.700 tons vórðu fiskað.

Samstundis hevur DDR góðtikið í Baltisku fiskivinnunevndini ein niðurskurð í heildartoskakvotu síni í Eysturtjóvum úr 6.550 tonsum í 4.000 tons í 1989.

Hin broytta støðan við stórum áhuga hjá okkum og minni áhuga hjá teimum og kvotuniðurskurðurin gjørdi, at teir bert kundu bjóða 650 tons av toski fyri 5.000 tons av svartkjafti.

Føroyska sendinevndin metti tað vera av týdningi at varðveita tey 750 tonsini. Fyri hetta var neyðugt at láta 1.000 tons av svartkjafti eyka. Eisini varð góðtikið at talið av skipum, DDR fær loyvi at hava í føroyskum sjógvi, verður 5 móti 4 í 1988, tó bert 4 í tí sonevnda høvuðsøkinum.

Endaliga avtalan kom at síggja soleiðis út:

Kvota

Førovar

	1987	1988	1989
Toskur[1]	1.300	750	750

([1] 50% kunnu skiftast um við sild í býtislut-fallinum 2:3)

DDR

	1987	1988	1989
Svartkjaftur[2]	10.000	6.000	6.000

([2] 10% kunnu skiftast um við makrel í býtisiutfallinum 2:3)

Tal av fiskiloyvum hjá DDR og Førcyum vera ávikavist 5 (4 í senn á høvuðsøkinum) og 15 (12 í senn).

Partarnir samdust um, nú so mikið er útliðið, at royna at fáa sáttmálaviðurskiftini avgreidd skjótast gjørligt.

Sáttmálarnir á týskum, føroyskum og donskum eru heftir upp í tingmálið.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/

/ Kjartan Hoydal

P R O T O K O L L

millum umboð fyri danskar og føroyskar myndugleikar øðrumegin og umboð fyri ráðharrastovu DDR fyri økisstýrdan íðnað og matvøruíðnað hinumegin um fiskiskap í árinum 1989.

Sendinevndirnar eru komnar ásamt um at leggja niðanfyri standandi uppskot fram fyri myndugleikar teirra til góðkenningar:

1. VEB Fischkombinat Rostock fær í árinum 1989 eina kvotu uppá 6.000 tons av svartkjafti á fiskiøki Føroya. Av hesum kunnu 600 tons av svartkjafti umskiftast við 900 tons av makreli.

2. Føroyar fáa á fiskiøki DDR í 1989 eina kvotu uppá 750 tons av toski. Harav kunnu í staðin fyri upp til 375 tons av hesi toskakvotu veiðast upp til 563 tons av síld.

3. Talið av skipum, sum kunnu veiða hesa kvotu á fiskiøki Føroya, er avmarkað til 5 før, tó kunnu hert 4 fiskifør vera í senn í tí ásetta høvuðsøkinum. Føroyar kunnu til veiðu av kvotuni á fiskiøki DDR nýta 15 før. Av hesum kunnu tó í mesta lagi 12 fiska samstundis á fiskiøki DDR.

4. Fiskifør undir føroyskum flaggi, sum í 1989 hava fingið loyvi frá fiskieftirliti DDR til at fiska á fiskiøki DDR, hava samstundis loyvi at fiska á einum øki innan fyri sjóøki DDR.

5. Partarnir royna at fáa í lag notuskifti til at játta sáttmálarnar um fiskiskap í 1989 áðrenn 1. mars 1989. Partarnir boða hvørjum øðrum frá, nær sínamillum fiskiskapurin kann byrja.

Berlin, hin 31. januar 1989

Kjartan Hoydal (sign.) Peter-Michael Küster (sign.)

P R O T O K O L L

für 1989

Zwischen Vertretern des Ministeriums für Bezirksgeleitete Industrie und Lebensmittelindustrie der DDR einerseits und Vertretern der dänischen und färöischen Behörden andererseite über die Fisherei im Jahr 1989.

Die Delegationen haben sich geeinigt, ihren Behörden folgende Vorschläge zur Bestätigung zu unterbreiten:

1. Dem VEB Fischkombinat Rostock wird für das Jahr 1989 eine Quote von Blauem Wittling in Höhe von 6.000 t in der Fischereizone der Färöer erteilt, wobei wahlweise anstatt bis zu 600 t Blauer Wittling aus der Gesamtquote bis zu 900 t Makrele gefischt werden können.

2. Die Färöer erhalten in der Fischereizone der DDR im Jahr 1989 eine Quote von 750 t Dorsch, wobei wahlweise anstatt bis zu 375 Dorsch aus der Gesamtquote bis zu 563 t Hering gefischt werden können.

3. Die Anzahl der Schiffe der DDR zum Abfischen der Quote in der Fischereizone der Färöer wird auf 5 Fang- und Verarbeitungsschiffe begrentzt, wobei nicht mehr als 4 in festgelegten Gebieten gleichzeitig arbeiten dürfen. Die Färöer können zum Abfischen der Quota in der Fischereizone der DDR 15 Fahrzeuge einsetzen. Von diesen Fahrzeugen dürfen jedoch höchstens 12 Fahrzeuge gleichzeitig in der Fischereizone der DDR fischen.

4. Den Fischereifahrzeugen unter der Flagge der Färöer, die für das Jahr 1989 vom Fischereiaufsichtsamt der Deutschen Demokratischen Republik Lizenzen für den Fischfang innerhalb der Fischereizone der DDR erhalten, ist gleichzeitig die Fischereidurchführung in einem Gebiet innerhalb der Territorialgewässer der DDR gestattet.

5. Beide Seiten streben an, den Notenaustausch zur Bestätigung der Vereinbarungen zu Fischerei im Jahre 1989 bis zum 1. 3. 1989 durchzuführen und werden so schnell wie möglich einander vom Datum des Fischereibeginns unterrichten.

Berlin, am 31. Januar 1989

Kjartan Hoydal (sign.)

Peter-Michael Köster (sign.)

P R O T O K O L L

for 1989

Mellem repræsentanter for danske og færøske myndigheder på den ene side og repræsentanter for DDR's ministerium for regionalstyrede erhverv og madvareindustri på den anden side om fiskeri i 1989.

Delegationerne er enedes om at forelægge deres myndigheder følgende forslag til godkendelse:

1. VEB Foschkombinat Rostock får i året 1989 en kvote for blåhvilling på 6.000 tons i Færøernes fiskerizone, hvoraf der valgfrit i stedet for indtil 600 tons blåhvilling af denne kvote kan fiskes indtil 900 tons makrel.

2. Færøerne får i DDR's fiskerizone i året 1989 en kvote på 750 tons torsk, hvoraf der valgfrit i stedet for indtil 375 tons torsk af denne kvote kan fiskes indtil 563 tons sild.

3. Antallet af skibe til udnyttelse af kvoten i Færøernes fiskerizone er begrænset til 5 fartøjer, hvoraf ikke mere end 4 skibe må arbejde i hovedområderne samtidig. Færøerne kan til udnyttelse af kvoten i DDR's fiskerizone anvende 15 fartøjer. Dog må kun 12 af disse fartøjer fiske i DDR's fiskerizone samtidig.

4. Fiskefartøjer under færøsk flag, der for året 1989 har fået tildelt licenser til fiskefangst i DDR's fiskerizone af DDR's fiskeriinspektion, har samtidig tilladelse til gennemførelse af fiskeri i et område inden for DDR's territorialfarvande.

5. Parterne bestræber sig på at gennemføre udvekslingen af noter til bekræftelse af aftalerne om fiskeriet i året 1989 inden den 1. marts 1989 og vil hurtigst muligt give besked om datoen for fiskeriets påbegyndelse.

Berlin, den 31. januar 1989

Kjartan Hoydal (sign.) Peter-Michael Köster (sign.)

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 66/1988 (vetrarting): Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (ÐDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1989.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 16. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 23. februar beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja tað.

MARKNAÐARNEVNDIN, 23. februar 1989.

Karin Kjølbro — Olaf Olsen — Lasse Klein

Pauli Ellefsen — Atli P. Dam — Suni Jacobsen

Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11080 . Telex 81310 hinens ja . Telefax 14042 . Pósthólf 64
Vanlig afgreiðslutíð: kl. 10—15. Laugardagar stongdir

14. februar 1989

F. L. j. nr.
Tað tilskila í svarinum 1319-20

KH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 57/1988: Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1989.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NAFO-ársfundinum í september 1988 um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum í 1989.

Viðmerkingar:

Á 10. regluliga ársfundi í NAFO, haldin í Halifax, Kanada, í september 1988, var tilráðingin aftur í ár frá vísindaliga ráðnum, at stovnurin av toski á Flemish Cap framvegis var ov lítil, og mælt varð tí frá at fiska av honum í 1989.

Undan NAFO-fundinum í 1987 hevði fiskivinnunevndin fund við tey reiðarí, sum fiska á Flemish Cap og varð semja um, at ekkurt álvarsligt mátti gerast fyri at fáa bankan á føtur aftur.

Best var at geva honum fullkomiliga frið í eitt ár.

Sendinevndin fyri Danmark (vegna Føroyar og Grønland) setti tí fram tað uppskot á fundinum í 1987, at Flemish Cap varð stongdur í eitt ár.

Semja var á fundinum í september 1988 um, at henda friðing skuldi standa við í 1989. Henda semja var einmælt og hevði serliga til endamáls at geva tí góða árganginum, sum er á veg inn í fiskiskapin, frið.

Ivi hevur verið um, um øll lond halda friðingina av Flemish Cap, og um hon sostatt ger nyttu. Kanadisk eftirlitsflogfør og skip hava regluliga kannað støðuna á bankanum. Somuleiðis sovjetisk og EF-vaktarskip. Sambært upplýsingum frá hesum eftirlitsarbeiði verður friðingin ikki vird 100%, men royndin á Flemish Cap er av friðingini minkað heilt nógv, og skip, serliga úr Spaniu og Portugal, sum fyrr royndu á Flemish Cap, royna nú í hellingini á Stóra Banka.

Kvotan av toski í NAFO-øki 3NO til "others" minkaði úr 1.400 tonsum niður í 850 tons frá 1988 til 1989. Føroysk línuskip hava ikki nýtt hesa kvotu seinastu árini.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/
/ Kjartan Hoydal

SCHEDULE 1

Quota Table[1] for 1987

Footnote 1	II	III	IV	V	VI	VII	VIII	IX	X	XI
Contracting Party	Cod	Cod	Redfish	Redfish	American plaice	American plaice	Yellowtail	Witch	Capelan	Squid (Illex)
	Div. 3M	Div. 3NO	Div. 3M	Div. 3LN	Div. 3M	Div. 3LNO	Div. 3LNO	Div. 3NO	Div. 3NO	Subareas 3+4 [2]
1. Bulgaria	-	-	300	-	-	-	-	-		500
2. Canada	-	11920	500	10650	150	29860	4875	3060	760	N.S.[3]
3. Cuba	-	-	1750	2450	-	-	-	-	700	2250
4. Denmark (Faroes & Greenland)	-	-	-	-	-	-	-	-		
5. European Economic Community	-	9420	3100	-	350	305	100	-	700	N.S.[3]
6. German Democratic Republic	-	-	-	850	-	-	-	-	-	-
7. Iceland	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
8. Japan	-	-	600	-	-	-	-	-	2612	2250
9. Norway	-	-	-	-	-	-	-	-	8400	-
10. Poland	-	-	-	-	-	-	-	-	840	1000
11. USSR	-	2985	13850	10500	1000	-	-	1950	14000	5000
12. Others	-	875	100	150	500	55	25	50	-	5000
13. Special Reservation[4]	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
14. Total Allowable Catch	0	25,000	20,000	25,000	2,600	30,100	5,000	5,000	20,000	150,000[5]

[1] Quotas are in metric tons.

[2] There are no Special Reservations for 1987.

[3] The opening date for the squid (Illex) fishery is 1 July.

[4] Any quota listed for squid may be increased by a transfer from any "coastal state" as defined in Article 1, para 3 of the NAFO Convention, provided that the TAC for squid is not exceeded. Transfers made to Contracting Parties conducting fisheries for squid in the Regulatory Area shall be reported to the Executive Secretary, and the report shall be made as promptly as possible.

[5] Not specified because the allocation to these Contracting Parties are as yet undetermined, although their sum shall not exceed the difference between the total of allocations to other Contracting Parties and the TAC.

For 1987 should remain at 150,000 tons subject to adjustment where warranted by scientific advice.

FAO/9/JB

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 67/1988 (vetrarting): Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1989.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 16. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 23. februar beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja tað.

MARKNAÐARNEVNDIN, 23. februar 1989.

Karin Kjølbro | Olaf Olsen | Lasse Klein

Pauli Ellefsen | Atli P. Dam | Suni Jacobsen

Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

14. februar 1989

F. L. j. nr. 1413-5-1

Tlf. 11080. Telex 81310 tingvs fa. Telefax 14942. Postbox 64
Skrivstovutíð: kl. 10—15, leygardan stongt

JøH/cr

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 68/1988: Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Uppskot

til

Løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir v.m.	Lagtingslov om garanti for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder m.v.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1989 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip, fiskavirkir og smolt- og alibrúk, sum eru komin í fíggjarligar trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 25 mió. kr.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med Finansudvalget på Landskassens vegne i finansåret 1989 at garantere for lån til fiskeskibe, fiskerivirksomheder og smolt- og fiskeopdrætsanlæg, der er kommet i drifts vanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 25 mio. kr.
§ 2. Treytirnar, fyri at veðhald kann verða veitt, eru hesar: 1. At líkindi eru til, at	§ 2. Betingelserne, for at garanti ydes, er disse: 1. At der er udsigt til, at driften fremover

rakstur in framvvir eftir bilum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.

2a. Har talan er um fiskavirkir ella smolt- og alibrúk, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av veðhildna láninum og at fingin verða onnur lán, sum í minsta lagi eru 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, og sum ikki kunnu krevjast aftureldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landskassin veðhellur fyri. Landsstýrinum er í serligum førum, har talan er um fiskavirki á smáplássi, heimilað at víkja frá regluni um 15% kravið.

2b. Har talan er um fiskiskip, har partafelag er ognari, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av veðhildna láninum.

2c. Har talan er um fiskiskip, har einstaklingur, partsfeløgini ella líknandi eru ognarar, at inngoldið er í minsta lagi út yvir

efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

2a. Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder eller smolt- og fiskeopdrætningsanlæg, at egen kapitalen forhøjes med mindst 10% af det garanterede lån og at andre lån tilvejebringes for mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, og som ikke kan kræves tilbagebetalt over et kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landskassen garanterer i henhold til denne lov. Hvor der er tale om fiskerivirksomhed på småpladser bemyndiges landsstyret til under særlige omstændigheder at fravige kravet om 15%.

2b. Hvor der er tale om fiskeskibe, der tilhører et aktieselskab, at egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garanterede lån.

2c. Hvor der er tale om fiskeskibe, hvor enkeltpersoner, partsrederier eller lignende er ejere, at der er indbetalt ud over den krævede egenkapital mindst sparet skat, som stammer fra afskrivning på skib

kravda eginpeningin spardur skattur, sum stavar frá avskriving upp á skipið skattaárini 1984, 1985, 1986, 1987 og 1988 og at nýinngoldin verða 10% av veðhildna láninum.

skatteårene 1984, 1985, 1986, 1987 og 1988 og at nyindbetalt bliver 10% af det garanterede lån.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 34 frá 20. mai 1988 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, ið sonevndu kreppulánini, jbr. løgtingsmál nr. 86/1987, er lógin galdandi í fíggjarárinum 1988.

Tilsagnir eftir hesi lóg eru givnar fyri 3.[illegible].000 kr. g

Viðmerkjast skal, at í 1988 komu reglur um serlán og stuðul til upphøggingar.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/

/ Kjartan Høydal

løgtingsmáli nr. 68/1988 (vetrarting): Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 16. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 23. februar beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í trí fíggjar minnilutar.

Ein minniluti (Svend Aage Ellefsen, Torbjørn Poulsen og Niels Pauli Danielsen) metir tað framvegis neyðugt at hava møguleikan opnan fyri at veita veðhald fyri virkjum og skipum í kreppustøðu, har útlit kortini er fyri framhaldandi lønandi rakstri.

Minnilutin tekur sostatt undir við uppskoti landsstýrisins, men vísandi til tær veðhildnu upphæddirnar seinastu árini og havandi í huga, at stórur partur av árinum longu er farin, og havandi í huga at fleiri skip, sum annars høvdu havt hjálp eftir fyriliggjandi lóg fyri neyðini, hava fingið serlán, so heldur minnilutin tað ikki verða neyðugt, at heimildin upp á 25 mió. kr. verður fasthildin, men heldur 12 mió. kr. vera meira hóskandi upphædd.

Skotið verður tí upp at broyta uppskot landsstýrisins samsvarandi hesum, og setir minnilutin tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður upphæddin: "25 mió. kr." broytt til: "12 mió. kr."	I § 1 ændres beløbet: "25 mio. kr." til: "12 mio. kr."

Ein annar minniluti (Vilhelm Johannesen og Jørgen Thomsen) tekur støðu í tingsalinum).

Ein triði minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

Løgtingsmál nr. 68: Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir varð lagt fram í løgtinginum av einum ósamdum landsstýri.

Hetta fyribrigdi tykist verða reglan heldur enn undantakið.

Undir viðgerð segði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, m.a., at hetta var ein prinsippspurningur fyri hann og helst flokkin eisini. Hann tók uppaftur vælkendu orðingina, at gongur tað væl, eigur tann privati, gongur tað illa, er ábyrgdin landskassans. Ikki einki um tað, men minnilutin heldur ikki, at henda lóg, sum hevur virkað, um ikki so væl, kann takast av frá degi til dags, og als ikki tí at Finnbogi Ísakson finnur tað fyri gott at arga løgmann og fólkaflokkin. Hin vegin segði løgmaður undir orðaskiftinum, at vit kunnu ikki bara uttan viðari sparka beinini undan vinnulívinum og lata alt fara, meðan Anfinn Kallsberg, landsstýrismaður helt fyri, at hava vit onga játtan, fer alt á heysin.

Eitt hús í stríð við seg sjálvt loysir ongar trupulleikar.

Sambandsflokkurin viðger sum vant øll løgtingsmál í álvara, ikiki í mun til, hvat tænir samgonguni, men altíð, hvat tænir samfelagnum best.

Minnilutin átalar harðliga, at samgongan ikki er før fyri at leggja fram ein fiskivinnupolitikk, sum innihber loysnir av teim trupulleikum, vinnan er komin í.

Hetta er eitt náttúrligt krav, annars eigur landsstýrið at leggja frá sær sum skjótast.

Í staðin fyri at tryggja viðtøku av einum uppskoti frá landsstýrinum, sum ikki hevur meiriluta aftanfyri seg innan samgonguna, leggur flokkurin tí fram nýtt uppskot til eiona fyribilsloysn av hesum spurningi.

Minnilutin mælir til, at upphæddin í lógaruppskotinum verður lækkað so við og við, soleiðis at um eini 2 - 3 ár verður ikki neyðugt at endurnýggja hesa lóg, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um fyribils-loysn viðvíkjandi veðhaldum fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1989 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip, fiskavirkir og smolt- og alibrúk, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 15 mió. kr.

§ 2. Treytirnar, fyri at veðhald kann verða veitt, eru hesar:

1) At líkindi eru til, at raksturin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.
2) At egnpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av veðhildna láninum.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om midlertidige løsning vedrørende garantier for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1989 at garantere for lån til fiskeskibe, fiskerivirksomheder og smolt- fiskeopdrætsanlæg, som er kommet i økonomiske vanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 15 mio. kr.

§ 2. Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

1) At der der udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.
2) At egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garanterede lån.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Hin triði minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir einki uppskot fram.

FÍGGJARNEVNDIN, 30. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardag stongt

14. februar 1989

F. L. j. nr. 1408-5-2

JØH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 69/1987: Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1989 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Eisini verða møguleikar fyri at borga vanligt fyri goymslulánum, bæði fyri rávørur og lidna framleiðslu, til niðursjóðingarvirki og til fiskarovkivirki í Førovum. Borgan verður givin fyri

Løgtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1939 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Også bliver det muligt at garantere simpelt for lagerlån, både for råvarer og for færdigproduktion, til konserveringsvirksomheder og til fiskerygningsvirksomheder på Færøerne. Kautionen ydes

lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 23 frá 22. apríl 1988, sum fer úr gildi 31. desember 1988, sí løgtingsmál nr. 51/1987.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, Løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

Higartil í fíggjarárinum 1987 eru hesar borganir veittar 25,2 mió. kr.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/

/ Kjartan Hoydal

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 69/1988 (vetrarting): Ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

Málið er framlagt av 16. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 23. februar beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið upplýsir í viðmerkingunum, at uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 23 frá 22. apríl 1988, sum fór úr gildi 31. december 1988, sí løgtingsmál nr. 51/1987. Víðari upplýsir landsstýrið, at í fíggjarárinum 1987 eru borganir veittar fyri 25,2 mió. kr.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini var vist á, at tørvur er fyri, at heimildin at borga verður víðkað til tess at stuðla fyritakssemi, ið ikki er umrøtt í higartil galdandi lóggávu á hesum øki.

Fíggjarnevndin er samd um, at hesin stuðul eisini eigur at verða veittur til alifóðurvirkir og til tøtingarvirkir og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1, 2. punktum verður orðað soleiðis:
"Eisini verða møguleikar fyri at borga vanligt fyri goymslulánum, bæði fyri rávørur og liðna framleiðslu, til niðursjóðingarvirkir, alifóðurvirkir, tøtingarvirkir og til

§ 1, 2. punktum formuleres således:
"Også bliver det muligt at garantere simpelt for lagerlån både for råvarer og for færdigvarer til konserveringsvirksomheder, fabrikker, der producerer foderstoffer til fiskeopdræt,

fiskaroykivirkir í Føroyum."

fabrikker, der tilvirker uldtøj og til fiskeryg-ningsvirksomheder på Færøerne."

FÍGGJARNEVNDIN, 29. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Lasse Klein Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

JAVNAÐARFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 70/1989 (vetrarting): Val av nevnd at kanna við tí fyri eyga at veita fíggjarliga hjálp til teirra, ið fingu skaða á hús í óðnarveðrinum herfyri.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið velur nevnd av tingmonnum, ein úr hvørjum flokkinum, til at kanna støðuna hjá teimum, ið fingu skaða á hús og aðrar ognir í óðnunum herfyri, við tí fyri eyga at veita teimum fíggjarliga hjálp.

Viðmerkingar:

Eftir at tvinnar óvanliga harðar óðnir um jóltíðir gjørdu stórskaða víða hvar her á landi, er týðiliga komið til sjóndar, at bráðneyðugt er at veita teimum hjálp, ið sita illa eftir skaðarnar. Tað eru tey, ið sita á berum eftir stormarnar, onnur misru stór virði, tí sethús og aðrar ognir fingu skaða í óðnunum.

Sagt er frá, at fólk eru sera illa fyri, av tí at tryggingin ikki tekur við fullum endurgjaldi og í summum føri als ikki tekur við.

Til slíka støðu kunnu uttan iva vera fleiri orsøkir.

Summi hava møguliga ikki tryggjað fyri vindskaða yvirhøvur, onnur hava ikki teknað serstaka trygging fyri nakað, so

um rútabrot, vatnskaða og annað.

Javnaðarflokkurin heldur tí, at lóggávuvaldið ikki kann lata sum einki, men at her eigur at komast til hjálpar á ein hvønn hátt, møguliga við lóggávu.

Tí loyva vit okkum at skjóta upp fyri tinginum at velja eina nevnd av tingmonnum, ein úr hvørjum flokki. Nevndin skal kanna hesa støðu til botns og við tí fyri eyga at hjálpa teimum, ið sita illa eftir av áðurnevndu ódnarveðrum.

Nevndin verður síðan at leggja málið fyri tingið.

Vísandi til hesar viðmerkingar loyva vit okkum at seta fram soljóðandi uppskot.

Á FØROYA LØGTINGI, 17. februar 1989.

Jørgen Thomsen

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 70/1988 (vetrarting): Val av nevnd at kanna við tí fyri eyga at veita fíggjarliga hjálp til teirra, ið fingu skaða á hús í ódnarveðrinum herfyri.</u>

Málið er framlagt av Javnaðarflokkinum tann 17. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 8. mars beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Tórbjørn Poulsen, Heini O. Heinesen, Niels Pauli Danielsen og Flemming Mikkelsen) ásannar, at talan er um eitt stórt mál - nógvir skaðar hendu, og fíggjarligu tapini vóru stór. Landsstýrið hevur gjørt ávist kanningararbeiði í hesum sambandi, og fyri at gera nýtslu av hesum verður mælt til, at landsstýrið fær málið, og setir nevndi meiriluti fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>samtyktar</u>

Løgtingið samtykkir, at hetta málið verður sent landsstýrinum at arbeiða víðari við í tilknýti til tað arbeiðið, ið longu er gjørt í samband við skaðarnar orsakaðir av ódrunum í vetur.

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot Javnaðarfloksins.

FÍGGJARNEVNDIN, 16. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini C. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 hmrns ia . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

20. februar 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 1500-1-11-2

KjH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 71/1988 (Vetrarting): Skipan millum Føroyar og Sovietsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1989.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið góðkennir hjálagdu avtalu frá 26. januar 1989 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1989.

Viðmerkingar:

Váttaða frásøgnin frá 12. fundinum í føroysku - sovjetsku felagsnevndini um sínamillum fiskivinnumál er hjálagd.

Samráðingarnar vóru sera truplar. Fyrsta umfar av fundinum í Moskva 14. - 17. november 1988 endaði uttan úrslit. Sovjet hevði ikki havt sínar samráðingar við Noreg og kundi tí ikki siga, hvussu nógvur botnfiskur, latast kundi Førovum. Heldur ikki kundu sovjetsku umboðini geva føroysku umboðunum nakað vist svar um møguleikarnar fyri at veiða skeljar í sovjetskum sjógvi í Barentshavinum.

Fyritreytir fyri samráðingunum.

Í norsk-sovjetsku sinamillum fiskivinnunevndini áseta londini, hvussu nógvur toskur og hýsa yvirhøvur skal veiðast í Barentshavinum. Harumframt áseta tey eisini, hvussu nógv kann latast triðjalondum.

16. desember 1988 varð sáttmáli gjørdur millum Noreg og Sovjett. Tølini fyri tosk og hýsu vóru lægri enn menn hevði væntað.

Gongin í TAC-num í Barentshavinum hevur verið henda:

	TAC frá fiskifrøðingum	Heildarkvota ásett	Veiða
1986	< 446.000	400.000	430.000
1987	< 645.000	560.000	518.000
1988	(530.000)363.000	(578.000)451.000	??

Í juni 1988 samdust Sovjet og Noreg um at minka ásettu kvotuna við 22% eftir at fiskifrøðingar høvdu lagt fram eina púra broyttu stovnsmeting og rátt til at ikki vórðu veidd meira enn 363.000 tons.

Nýggj ráð komu frá fiskifrøðingunum í november 1988, og mæltu teir til at veiðiorkan átti at minka. Hetta kundi verið gjørt knappliga, og so kom tilrádda veiðan at vera 300.000 tons ella í stigum og so var tilmælið 371.000 tons í 1989.

Noreg og Sovjet samdust um 260.000 tons, sum heildarkvotu. Aftrat hesum luta teir sær hvør 40.000 tons av ávikavist norskum "kyst"toski og sovjetskum "murmansk"toski. Til hetta er at siga, at norski fjørðatoskurin er ein serligur stovnur, men sonevndi "Murmansk"toskurin verður roknaður upp í vanliga barentshavstoskin, men sum serligi lutur sovjetmanna. Sostatt samsvarar henda semja við tilráðingina um 300.000 tons av barentshavstoski fyri 1989.

Við hýsuni er upp aftur verri statt. Her er heildarkvotan ásett til 83.000 tons. Hon var í 1988 240.000 tons.

Partarnir ásettu samstundis, at triðjalond tilsamans kundu veiða 16.000 tons av toski og 7.000 tons av hýsu í

sjóøkinum hjá báðum londum. Tølini í fjør vóru 31.400 tons av toski og 24.000 tons av hýsu. Haraftrat vórðu 12.000 tons av toski sett av til Svalbard økið.

Viðvíkjandi skeljum kom tað fram, at sovjetskir lívfrøðingar meta tilfeingið í sovjetiskum sjógvi at vera rættiliga avmarkað. Rættiliga nógvar atfinningar hóvdu verið av loyvinum til føroyskar skeljabátar til royndarfiskiskap í 1988 millum annað lesarabrøv í sovjetskum bløðum. Sovjetskir serfrøðingar mettu heldur ikki, at úrtøkan í veiðuni var nóg góð.

Úrslit av samráðingunum.

Sovjetsku umboðini søgdu seg vilja varðveita sáttmálan á sama støði sum í 1988. Føroysku umboðini søgdu seg hava sama áhugamál, men dentur varð lagdur á at fáa sovjetisku sendinevndina at skilja, at ein ov lág heildarkvota kom at gera samráðingarnar við Føroyar sera truplar, og samstundis, at ein loysn fyri báðar skeljatrolararnar hevði avgerandi týdning. Í hvussu so er fór at vera ómøguligt at varðveita støðið í sáttmálanum, um Sovjet hevði ov lítið at bjóða av toski (og herundir eisini av toski, sum kundi fiskast í norskum sjógvi) og ikki kundi bjóða skeljar.

Úrslit fyri 1989.

Føroysk rættindi	1988	1989
Barentshavið, toskur o.a.	21.000	16.500
Flatfiskur	-	2.500
Eysturssjógvurin	5.500	5.500
Heild	26.500	24.500

Sovjetsk rættindi	1988	1989 (javnað niður)
Svartkjaft	142.000	105.000
Makrelur	5.000	4.200

Føroysk skip hava haraftrat loyvi til at veiða 2.500 tons av rækjum í sovjetiskum sjógvi. Eingin lodna er í Barentshavinum í løtuni. Kemur hon aftur, eiga Føroyingar 20.000 tons og skulu lata 20.000 tons av svartkjafti afturfyri. Haraftrat førdi føroyska sendinevndin fram undir samráðingunum, at eydnaðist tað at flyta upp til 5.000 tons av toski o.ø. í norskan sjógv, so kundi sovjetska svartkjaftakvotan hækka 3.000 tons fyri hvørt tonsið, sum varð yvirflutt.

Um royndarveiðu varð avtalað, at føroysk skeljaskip kunnu fiska upp til 1.000 tons á royndarveiðu og annars eru sovjetskir myndugleikar sinnaðir at samráðast við føroyska partin um felags veiðu eftir hørpuskel á búskaparliga økinum hjá sovjetsamveldinum.

Sovjetsamveldið fær somu møguleikar, sum árini fyri, at royndarfiska á djúpum vatni og eftir høgguslokki.

Talið av fiskiloyvum hjá báðum pørtum er líkt sama sum í fjør.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/
/

Kjartan Hoydal

V Á T T A D F R Á S Ø G N

frá framhaldinum av tólvta fundinum í føroysku-sovjetsku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál.

I Eftir innbjóðing frá Føroya landsstýri og sambært sáttmálanum frá 27. november 1977 millum stjórn Sovjetsamveldisins øðrumegin og stjórn Danmarkar og Føroya Landsstýris hinumegin um sínámillum fiskirættindi Føroyar-Sovjetsamveldið og í samsvar við váttaðu frásøgnina frá 12. fundi í føroysku-sovjetsku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál frá 17. november 1988 varð framhaldið av tólvta fundi í føroysk-sovjetsku felagsnevndini hildið í Tórshavn í døgunum 23.-26. januar 1989.

II Sum umboð fyri sáttmálapartarnar á 12. fundi í felagsnevndini vóru:

Fyri Føroyar í felagsnevndini:
Kjartan Hoydal
Hjalti í Jákupsstovu

Fyri Sovjetsamveldið í felagsnevndini:
Sergej I. Bogdanov

Á tólvta fundinum í felagsnevndini umboðaðu tær í skjali 1 nevndu samráðingarnevndirnar Føroyar og Sovjetsamveldið.

III Felagsnevndin samtykti hesa dagsskrá:

1. Fundarseta
2. Dagsskrá samtykt
3. Áseta kvotur fyri sínámillum fiskiveiði í 1989
4. Áseta tal av loyvum fyri 1989
5. Reglur um loyvi fyri sínámillum fiskiveiði í 1989. Fráboðan frá fiskiskapi í sovjetskum sjóøki og í føroyskum sjóøki og at lúka treytir fyri fiskiskapi.
6. Umrøða felagsætlanina fyri royndarfiskiskapi og fiskirannsóknarligum arbeiði í 1989.
7. Ymist
8. Fundarslit

IV Viðvíkjandi máli 3 á dagsskránni komu partarnir ásamt um at geva hvør øðrum hesar sínámillum veiðimøguleikar í 1989:

a. Føroyska myndugleikarnir loyva sovjetskum skipum at fiska upp til 125.000 tons av svartkjafti til matna í føroyskum fiskiøki. Farast kann undir fiskiskapin eftir 105.000 tonsum av hesum 1. januar 1989. Um veiðina av teimum 20.000 tonsunum, sum eftir eru, skal samráðast partanna millum um telex.

Aftaná samráðingar millum partarnar um telex kunnu føroysku myndugleikarnir loyva, at veidd verða upp til 15.000 tons av svartkjafti aftrat.
Uppií svartkjaftakvotuni er hjáveiði eftir makreli, ið ikki slepst undan.

b. Sovjetski parturin loyvir føroyskum skipum at veiða 16.500 tons av toski og hýsu, íroknað hjáveiði eftir øðrum fiskasløgum (av hesum eru 11.900 tons toskur, 2.800 tons hýsa og 1.800 tons onnur fiskasløg) og 2.500 tons av rækjum í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og íGystrasalti, uttan fyri 12 fjórðingar.

VI Viðvíkjandi máli 5 á dagsskránni varð hetta nevnt:

a. Báðir partar gjørdu hvør annan kunnugan við tær reglur, ið galda fyri fiskiskap ávikavist á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti og á føroyskum fiskiøki.

b. Hvør partur ansar eftir, at skip hansara halda tær lógir og reglur, ið galda fyri fiskiskap á økjum, ið eru undir lóggávu hjá hinum partinum. Serligar reglur kunnu verða settar í verk í tíðarskeiðinum mars til og við juni fyri svartkjaftaveiðuna á føroyskum fiskiøki fyri at sleppa undan troðkan, meðan fiskiskapurin fer fram á einum lutfalsliga avmarkaðum øki.

c. Viðvíkjandi mannagongdini at geva loyvi til fiskifør til sínámillum fiskiskap á økjum undir sovjetiskari og føroyskari lóggávu komu partarnir ásamt um, at teir fyri árið 1989, ikki seinni enn 15 dagar innan fiskiskapurin byrjar, verða at senda yvirlit yvir tey skip, talan er um.

d. Partarnir komu ásamt um, at neyðug umbøn um at umskifta loyvi til skip skal verða um telex, sum verður sent til Murmansk, Riga ella Tórshavn, eftir somu mannagongd sum árini frammanundan, áðrenn fiskiskapurin byrjar.

e. Báðir partar verða at nýta telex at loysa allar operativar spurningar í sambandi við sínámillum fiskiskapin.

f. Partarnir vóru samdir um, at skipini í loyvisspurningum helst skulu nýta Murmansk, Riga ella Tórshavn sum atloguhavnir.

Av nevndu 15.500 tonsum av toski og hýsu, íroknað hjáveiði, kunnu 6.000 tons verða veidd í felagsøkinum í Barentshavinum og 5.500 tons í Eystrasalti, og økið har loyvt er at fiska írestandi 3.000 tonsini av toski og hýsu, íroknað hjáveiði, verður kunngjørt føroyskum myndugleikum seinni. Eittnvørt av nevndu tølum fyri tosk og hýsu íroknað hjáveiði verður eftir avtalu partanna millum hækkað, um so er, at eitt ella tvey av hinum tølunum verða lægri.

Viðvíkjandi møguleikunum hjá føroyskum skipum at veiða upp til 20.000 tons av lodnu í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum, skulu nærri samráðingar verða partanna millum um telex.

Sovjetski parturin loyvir føroyskum skipum at fiska 2.500 tons av flatfiski í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum.

V Viðvíkjandi máli 4 á dagsskránni komu partarnir ásamt um hetta:

a. Sovjetisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum alt árið 1989 at veiða tosk, hýsu, rækjur og flatfisk á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og Eystrasalti.

b. Føroysku myndugleikarnir geva 24 sovjetskum skipum loyvi at veiða svartkjaft í tíðarskeiðinum 1. apríl til 31. oktober 1989 (av hesum kunnu á økinum ásett í punkti VI b í tíðarskeiðinum 15. apríl til 31. mai 1989, tó í mesta lagi vera 15 skip) og 15 sovjetiskum skipum í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. mars og 10 í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember 1989 á føroyskum fiskiøki.

VII Viðvíkjandi máli 6 á dagsskránni komu partarnir ásamt hetta:

Føroyski parturin gevur 5 sovjetskum skipum loyvi til royndarfiskiskap á føroyskum fiskiøki djúpri enn 700 m. Upp til 3 skip kunnu fáa loyvi samstundis.

Frá føroyskari síðu verður loyvt einum av teimum trimum omanfyri nevndu skipum at reka djúpvatnsroyndarfiskiskap á Outer Bailey Banka á dýpi ímillum 500 og 700 m, tó soleiðis at í mesta lagi 200 tons av djúpvatnsfiski verða veidd har.

Føroysku myndugleikarnir loyva 5 sovjetskum skipum at reka beinleiðis makrelfiskiskap og royndarfiskiskap eftir høgguslokki á føroyskum fiskiøki á teimum leiðum, har tað er loyvt sovjetskum skipum at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða veiðan eftir makreli má ikki fara upp um 4.200 tons, og royndarveiðan eftir høgguslokki ikki upp um 2.000 tons.

Um so er, at einki er til av makreli og høgguslokki, kunnu nevndu skip í juni - august veiða av samlaðu svartkjaftakvotuni, sum sovjetsk skip hava á fiskiøki Føroya. Tá lagt verður um til annan fiskiskap, skulu skipararni á nevndu skipum í góðari tíð boða viðkomandi føroysku myndugleikunum frá hesum.

Sovjetski parturin loyvir tveimum føroyskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir hørpuskel. Hetta tíðarskeið skal veiðan eftir hørpuskel ikki fara upp um 1000 tons.

Sovjetskir myndugleikar fara ikki seinni enn 10. februar 1989 at siga føroyskum myndugleikum frá, á hvørjum leiðum og í hvørjum tíðarskeiðum hesin royndarfiskiskapur kann vera.

Partarnir avtalaðu at hava samrøður um skipan av felags veiðu eftir harpuskel á búskaparliga økinum hjá Sovjetsamveldinum.

Á hesum skipum kunnu vera 2 sovjetiskir serfrøðingar.

Partarnir komu ásamt um - um møguleiki býðst og eftir nærri avtalu - at kanna spurningin um at reka royndarfiskiskap eftir atlanto-skandiskari síld í fiskiøkjunum hvør hjá øðrum.

Hvør parturin skal í góðari tíð um telex leggja ætlanir nar fyri tílíkum royndararbeiðum fram fyri hin partin.

VIII Í sambandi við mál 7 á dagsskránni - ymist - søgdu partarnir frá, at tair mettu tað vera ynskjandi, at vísindaliga samstarvið varð víðkað, harímillum lutur partanna í fleirilanda vísindaligum samstarvi um svartkjaft og síld, m.a. við tí í hyggju at áseta TAC fyri hesar veiður.

Viðvíkjandi atlanto-skandisku síldini eru partarnir samdir um at boða frá einum og hvørjum tilburði av veiðu eftir hesum fiskaslagi undir fiskiskapi, royndarfiskiskapi ella havrannsóknum á fiskiøkjunum hvør hjá øðrum.

Partarnir løgdu dent á tey góðu úrslitini frá royndunum at fáa í lag onnur samstørv á fiskivinnuøkinum og løgdu áhuga sín fyri hesum samstarvi koma til kennar.

IX Partarnir samdust um, at trettandi fundurin í felagsnevndini skuldi haldast í Sovjetsamveldinum í seinnu helvt av 1989.

Dagsskráin fyri trettanda fundin í felagsnevndini verður lagd til rættis ígjøgnum stjórnarumboð.

Henda frásøgn er skrivað í Tórshavn, 25. januar 1989 á føroyskum, donskum og russiskum. Allir tekstir hava sama gildi.

Umboð fyri Føroyar
í felagsnevndini:

Kjartan Hoydal

Umboð fyri stjórnina í Samveldinum av Sosialistiskum Sovjetríkjum í felagsnevndini:

S.I. Bogdanov

Føroysku umboðini á framhaldinum av 12. fundi í føroysku-sovjetisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál í Tórshavn, 23.-25. januar 1989

Kjartan Hoydal - fiskivinnustjóri, Føroya Landsstýri
Hjalti í Jákupsstovu - stjóri á Fiskirannsóknarstovuni
Karl Andreassen - fulltrúi, Føroya Landsstýri
Mortan Johannesen - skipari, reiðari
Árni Olafsson - ráðgevi, Uttanríkismálaráðið
Bozena Rasmussen - tulkur

Sovietisku umboðini á framhaldinum av 12. fundi í føroysku-sovietisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál í Tórshavn, 23.-26. januar 1989

Sergei J. Bogdanov - ábyrgdarskrivari í stýrinum fyri uttanríkissambondum
A.V. Rodin - varastjóri í "Sevrybpromrazvedki"
O.V. Pankratova - inspektorur í protokoldeild stýrisins fyri uttanríkissambondum
V.A. Belobragin - sendifulltrúi á sovjetsku sendistovuni í Keypmannahavn

Skjal 2

Felagsætlan fyri vísindaligum samstarvi millum Føroyar og Sovjetsamveldið

Í 1988 hava sovjetsk vísindalig rannsóknar- og leitingarskip hildið fram við at kanna fiskastovnarnar og tey serstøku viðurskiftini, ið galdandi eru fyri fiskastovnarnar svartkjaft, makrel og høgguslokk á føroyskum fiskiøki. Harumframt vórðu gjørdar ekkómetingar av svartkjaftastovninum í opnu økjunum í Norska-havinum, á norskum og føroyskum havøki. Kanningar av atlanto-skandiskari sild eru gjørdar á gýtingarøkjunum.

Partarnir tosaðu um úrslitini frá felags rannsóknum og løgdu serligan dent á nyttuna av nøvvum samstarvi og á týdningin av lívfrøðiligum tilfari fyri at loysa praktiskar spurningar viðvíkjandi havfiskiskapinum.

Partarnir komu ásamt um hesa ætlan fyri rannsóknarsamstarvið í 1989.

1. Rannsóknarferðir fyri metan av svartkjaftastovninum og savnan av havrannsóknarligum og lívfrøðiligum tilfari

   Í 1989 (mars-juni) er ætlanin at fara undir at meta svartkjaftastovnarnar á gýtingarøkjunum og at kanna svartkjafta stovnarnar akustiskt í vakstrartíðini. Arbeiðið við at betra aldursgreiningarnar hjá svartkjaftinum verður ført víðari samsvarandi tilráðingum frá svartkjaftaarbeiðsbólkinum í ICES.

2. Rannsóknarferðir til at kanna og meta makrel- og høgguslokkastovnarnar og savna havrannsóknarligt og lívfrøðiligt tilfar

   Í 1989 er ætlanin at halda fram við felagsarbeiði til at meta makrel- og høgguslokkastovnarnar á føroyskum sjóøki. Rannsóknirnar skulu verða gjørdar við einum sovjetskum havrannsóknarskipi, har føroyskir serfrøðingar eru við.

3. Kanna útbreiðslu og cýtingareffektivitetin hjá atlanto-skandiskari sild

Báðir partar skulu seta í verk kanningar av sildaeindum sambært ætlanunum hjá viðkomandi fiskirannsóknarstovum.

Føroysku myndugleikarnir loyva royndarfiskiskapi eftir atlanto-skandiskari sild við einum skipi við drívgørnum á føroyskum sjóøki. Í hesum sambandi kunnu føroyskir serfrøðingar vera umborð. Partarnir senda hvør øðrum úrslitini frá kanningunum við posti.

4. Havrannsóknir til at kanna lívfrøðiligt ríkidømi av ræevni á dýpdum størri enn 500-700 m

Á vetri og vári 1989 heldur eitt sovjetiskt havrannsóknarskip fram við kanningunum av djúphavsfiskastovnum á føroyskum sjóøki. Við Outer Bailey Banka halda fram kanningar av fiskasløgum, ið liva á markinum ímillum grunt og djúpt vatn (500-2000 m), fyri at meta um fiskastovnarnar og veiðimøguleikarnar har. Rannsóknirnar verða gjørdar við einum sovjetiskum havrannsóknarskipi, har føroyingar eru við.

Partarnir geva hvør øðrum upplýsingar um úrslitini frá hesum fiskirannsóknum á næsta regluliga fundi í føroysk-sovjetisku felagsnevndini.

5. Samstarv til at kunngera rannsóknarúrslit

Teir sovjetisku og føroysku serfrøðingarnir fara at skriva greinir um svartkjaft, djúphavsfisk og oceanografi á sjóøki Føroya við tí í hyggju at kunngera greinirnar í vísindaligum tíðarritum. Umbýti av havfrøðiligum tilfari, sum er innsavnað á fiskiveiðiøkjum partanna, verður gjørt á næsta regluliga fundi í føroysku-sovjetsku felagsnevndini.

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 71/1988: (vetrarting) Skipan millum Føroyar og Sjovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1989.

Málið er lagt fram av landsstýrinum 23. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 23. februar 1989 beint til viðgerðar í marknaðarnevndini.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Pauli Ellefsen, Suni Jacobsen og Atli P. Dam vísa til viðmerkingar teirra í løgtingsmáli nr. 72.

MARKNAÐARNEVNDIN, 23. ferbuar 1989.

Karin Kjølbro — Olaf Olsen — Lasse Klein

Niels Pauli Danielsen — Pauli Ellefsen — Suni Jacobsen

Atli P. Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

Tlf. 11080 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Afgreiðslutíð: Kl. 10—15. Leygardag stongt

22. februar 1989

F. L. j. nr. 1500-1-11-5
(at tilskila í svari)

KH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 72/1988 (Vetrarting): Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1989.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið góðkennir hjáløgdu avtalu frá 21. februar 1989 millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1989.

Viðmerkingar:

Váttaða frásøgnin frá fundinum millum føroyskar og norskar myndugleikar um sínamillum fiskivinnurættindi í 1989 er løgd hjá.

Viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum í Barentshavinum verður víst til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 71/1988: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1989.

Á talvuni niðanfyri sæst hvat Noreg og Sovjet í mesta lagi kunnu lata triðjalondum av torski og hýsu. Harumframt eru møguleikar fyri upsa, svartkalva og kongafiski, men óvist hvussu nógv.

Slag	Ár	Á USSR øki	Á norskum øki	Í 1000 tonsum Heild
Toskur	1988	12,6	18,8	31,4
	1989	6,4	9,6	16,0
Hýsa	1988	9,6	14,4	24,0
	1989	2,8	4,2	7,0

Samráðingar við Noreg 19. desember.

Annað umfar av samráðingunum við Noreg var 19. desember í Keypmannahavn. Føroyska sendinevndin endurtók tey føroysku grundsjónarmiðini frá fyrsta umfari, at vit ikki skiltu, at samband skuldi vera millum tær kvotur, londini vildu tilluta sær sjálvum, og ta nøgd tey vildu lata øðrum fyri at fáa fiskirættindi aðrastaðni. Hevði eitt land stóran áhuga fyri at fáa rættindi aðrastaðni, kundi tað hava áhuga fyri at lata av einari teprari kvotu heima hjá sær sjálvum. Vit kundu sostatt bjóða norðmonnum ein sáttmála fyri 1989 á sama støði sum í 1988. Norðmenn endurtóku á sama hátt frá fyrsta umfari, at teir fóru at krevja somu niðurskurðir frá føroyingum, sum frá sínum egnu og at teirra grundsjónarmið var at eingin partur av sovjetsku kvotuni kundi yvirflytast til norskt øki. Hart kroystur vildi Hallstein Rasmussen tó góðtaka 1200 tons av toski yvirflutt, men til hetta hevði hann einki greitt mandat heimanifrá. Seinni hevur hann í telefonsamrøðu tikið hesa tilsøgn aftur.

Í tonsum kundu teir sostatt bjóða á norskum øki:

Norðan fyri 62°			1988
Tosk	1700	tons	(3400)
Hýsu	300	-	(950)
Annað	400	-	(850)
Makrel	3000	tons	(men ongan møguleika at sleppa suður um 62°). Sama í 1988.
Svartkjaft	5000	tons	(5000)

Sunnan fyri 62°		
Hvítingsbr.	22000 tons	(22000)
Upsi	1600 -	(1500)
Síld	1300 -	(1600)

Við Jan Mayen kundu vit fáa somu nøgd av svartkjafti, og við Svalbard kom toskakvotan at fella úr 800 niður í 400 tons og onnur sløg úr 300 niður í 150.

Tá norska sendinevndin fekk at vita, at niðara mark fyri yvirflytingum; sum vit kundu góðtaka, var 5000 tons, varð greitt, at meira gjørdist ikki í hesum umfari.

Semja var um at hittast aftur í Føroyum, eftir samráðingar høvdu verið millum Føroyar og Sovjett. Tó undirstrikaði norska sendinevndin, at eingin grund var at hittast, um útlitini fyri semju ikki vórðu fregari.

3. samráðingarumfar við Noreg 21. februar.

3. umfar við Noreg varð upprunaliga sett til 2. - 3. februar 1989. Áðrenn farið varð undir 3. umfar, var samband við norskar myndugleikar um útlitini. Hetta vísti, at norðmenn framhaldandi hildu fast um, at 1200 tons var tað mesta teir kundu loyva at yvirflyta frá sovjetskum sjógvi, tó kundi tað hugsast at hetta kundi førkast upp móti 2000 tonsum. Landsstýrið helt fast um, at so smáir møguleikar at flyta yvir ikki kundu vera annað enn politiskt grundaðir, tí einki viðvikjandi stovnsvarðveiting ella øðrum talaði fyri hesum, tvørturímóti.

Landsstýrið metti tí, at embætismannanevndirnar, sum høvdu samráðst, ikki sluppu longur, og tann politiski trupulleikin, sum tyktist búgva undir, mátti takast upp á politiskum støði. Løgmaður bað tí um norsku sendistovuna í Keypmannahavn um fund við norska fiskimálaráðharran.

Hesin fundur var 20. februar á norsku sendistovuni í Keypmannahavn. Á fundinum legði løgmaður føroysku grundsjónarmiðini fram. Norski fiskimálaráðharrin vildi ikki beinleiðis nevna nøkur tøl. Hann vísti á truplu støðuna í Noregi, har verkstmiðjutrolarar høvdu toskakvotur, sum vóru minni enn 700

tons fyri árið. Hetta gjørdi, at norskir politiskir myndugleikar vóru undir hørðum trýsti ikki at lata øðrum nakað. Hetta var mett at vera trupulleikar, sum serliga komu at merkja árið 1989. Niðurstøðan av fundinum varð tó, at nú mátti eitt úrslit finnast og at embætismannanevndirnar skuldu hittast sum skjótast og gera sáttmálan lidnan.

Embætismannanevndirnar hittust so aftur 21. februar og semja varð um at leggja fyri politisku myndugleikarnar hjálagda uppskot til fiskiveiðuavtalu fyri 1989. Tølini eru tey somu, sum vórðu boðin á samráðingarumfar. Týdningarmesta úrslitið varð, at norðmenninir nú gjøðtóku at loyva yvirflyting av 2400 tonsum av toski og 600 tonsum av hýsu og øðrum av tí kvotu, Føroyar hava fingið frá Sovjetsamveldinum.

Afturfyri varðveittu norðmenn botnfiskakvotu sína undir Føroyum. Vegna avtalu Føroya við EF um makrel, minkaði norska kvotan av makreli undir Føroyum úr 12000 niður í 10630 tons. Brugdulivur var óbroytt og fyri annars at fáa javnvág í sáttmálan, minkaði svartkjafturin til norðmenn úr 60000 niður í 35000 tons.

Lagt er hjá sum skjal 2 fiskimøguleikarnir viðvikjandi rundum fiski hjá føroyskum fiskiførum, yvirhøvur, í Barentshavinum í 1989.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/
/ Kjartan Hoydal

BILAG 1

P R O T O K O L

fra

DRØFTELSER MELLEM FÆRØSKE OG NORSKE MYNDIGHEDER I KØBENHAVN DEN 21. FEBRUAR 1989 OM GENSIDIGE FISKERIRETTIGHEDER I 1989

Den 21. februar 1989 drøftede en færøsk delegation, ledet fiskeridirektør Kjartan Hoydal, og en norsk delegation, l af assisterende fiskeridirektør Hallstein Rasmussen, færø fiskeri i Norges fiskerizoner og norsk fiskeri i færøsk fiskerizone i 1989. Mødet i København var en fortsættelse tidligere drøftelser i København 7. og 19. december 1988. Drøftelserne var baseret på aftalen om gensidige fiskerir tigheder undertegnet 7. februar 1979.

./. Deltagerne i mødet fremgår af bilag 1.

Parterne blev enige om:

I. FÆRØSK FISKERI I NORGES FISKERIZONER

A. I DEN ØKONOMISKE ZONE NORD FOR 62° N. Br.

1. a) 1.700 tons torsk
   b) 300 tons kuller (hyse)
   c) 400 tons andre arter, rødfisk (uer), sej, hellefisk (blåkveite)

2. Overført fra de færøske kvoter i USSR's økonomiske z
   a) 2.400 tons torsk
   b) 300 tons kuller (hyse) og
   c) 300 tons andre arter, rødfisk (uer), sej, hellefisk (blåkveite).

---

*) Giver ikke grundlag for fiskeri i fiskeværnszonen ved Svalbard

Af det totale kvantum af andre arter nævnt under pur 1(c) og 2(c) er det kun tilladt at fiske indtil 200 tons af hver af arterne rødfisk (uer), sej og heller (blåkveite).

De kvanta kuller (hyse), der er nævnt under 1(b) og 2(b) skal dække bifangsten i fiskeri efter torsk. Uundgåelige bifangster af andre arter indgår i total kvanta af andre arter.

3. 3.000 tons makrel.

4. Indtil 5.000 tons blåhvilling (kolmule) som forsøgsfiskeri i et nærmere afgrænset område.

50% af de enkelte færøske torskefangster i det tilstødende område i Barentshavet, som grænser op til Norges og USSR's fastlandskyster, skal afregnes på de færøske kvoter, tilde af Norge.

På grund af den ressourcemæssige situation for loddebestan den i Barentshavet har Norge og Sovjetunionen aftalt, at d ikke skal fiskes lodde i Barentshavet i 1989. Derfor kunne man fra norsk side ikke give Færøerne nogen loddekvote. De vil ikke præjudicere spørgsmålet om en tildeling til Færø af en loddekvote i senere år.

B. I DEN ØKONOMISKE ZONE SYD FOR 62°N Br.

1. 22.000 tons sperling (øyepål), tobis, blåhvilling (kolmule) og brisling, hvoraf indtil 2.000 tons brisling. Kvoten omfatter også bifang af andre arter, dog ikke af sej og sild.

2. 1.600 tons sej, inklusive bifangst i andre fiske

3. 1.300 tons sild, inklusive bifangst i andre fisk

På grund af den lave totalkvote i 1989 for makrel i Nords kunne man fra norsk side ikke give Færøerne nogen makrelkv te. Dette vil ikke præjudicere spørgsmålet om en tild 'in til Færøerne af en makrelkvote i senere år.

Dersom tobisfiskeri i henhold til anbefaling fra ACFM af bestandsmæssige hensyn begrænses for norsk fiskeri, skal samme begrænsning også gælde for færøsk fiskeri.

C. I FISKERIZONEN VED JAN MAYEN

5.000 tons blåhvilling (kolmule).

På grund af den generelle ressourcesituation i norsk lodde fiske kunne man fra norsk side ikke give Færøerne nogen loddekvote ved Jan Mayen. Dette vil ikke præjudicere spørg målet om en tildeling til Færøerne af en loddekvote i sene år.

D. I FISKEVÆRNZONEN VED SVALBARD

Fra færøsk side erklærer man sig villig til at begrænse s: fiskeri i fiskeværnszonen ved Svalbard til maksimum 400 t torsk og indtil 150 tons andre arter, væsentligt rødfisk (uer) og hellefisk (blåkveite), inden for den tredjelands- kvote, som er aftalt mellem Norge og Sovjetunionen for fis værnszonen ved Svalbard.

De færøske myndigheder påtager sig at begrænse det færøske rejefiskeri i fiskeværnszonen ved Svalbard til 11 fartøjer gennemsnitlig 7 fartøjer i fiskeriet samtidig.

Den norske part kan med kort varsel etablere områder i fis værnszonen ved Svalbard, hvor det af hensyn til bevaring a yngel skal være forbudt at drive trawlfiskeri.

II. NORSK FISKERI I FÆRØSK ZONE

1. 6.000 tons bundfisk (lange, brosme, sej, blålanc Inden for denne kvote må sejfangsterne ikke overst 1.150 tons. Kvoten omfatter også bifangst af andre bundfiskearter, op til 1.200 tons tilsammen. Heraf m bifangst på en enkelt fangstrejse ikke overstige 35 Fiskeriet forudsættes drevet med henholdsvis sejgarn bankline. Dog kan sej fiskes med trawl.

2. 10.630 tons makrel

3 35.000 tons blåhvilling (kolmule).
Blåhvilling kan fiskes med trawl eller not.
Antal fartøjer med licens til trawlfiskeri: 55
Antal trawlfartøjer samtidig: 22, desuden 13 på forsøgsfiskeri (fiskeleting) uden for det hovedfelt, som til enhver tid defineres af den færøske fiskeri- inspektion.

4. 100 tons brugdelever.

III. LICENSSPØRGSMAL

Parterne blev enige om inden 15. marts 1989 at sende hina en liste over de fartøjer, som ønsker at deltage i fisker i den anden parts zone. Det vil være muligt at efteranmel fartøjer.

Fartøjer, som har haft tilladelse til at fiske i hinanden zoner i 1988, kan benytte samme tilladelse indtil videre 1989.

IV. ANDRE SPØRGSMAL

Blåhvilling (kolmule).

Parterne noterede sig, at NEAFC på sit 7. årsmøde den 23. november 1988 har vedtaget en henstilling til vedkommende fiskeriforvaltende myndigheder om at tage en vejledende TA for denne bestand på 0,7 mio. tons i betragtning ved fastsættelse af deres reguleringstiltag for 1989 (og såfremt der ikke fremkom en ændret videnskabelig rådgivning, også for 1990).

København, den 21. februar 1989

/ Kjartan Hoydal

/ Hallstein Rasmussen

Forhandlingerne om gensidige fiskeriretigheder i 1989

mellem færøske og norske myndigheder

7. december og 9. december 1988
og 21. februar 1989

i København

Færøernes delegation:

Fiskeridirektør Kjartan Hoydal, delegationsleder, Færøernes landsstyre

Fuldmægtig Karl Andreassen, Færøernes landsstyre

Underdirektør Jákup Sólstein, Færøernes Rederiforening

Konsulent Árni Olafsson, Udenrigsministeriet

Norges delegation:

Ass. fiskeridirektør Hallstein Rasmussen, delegationsleder, Fiskeridirektoratet

Underdirektør Gunnar Kjønnøy, Fiskeridepartementet

Sektionsleder Tarje Løbach, Fiskeridirektoratet

Reder Inge Halstensen

Minister Thomas J. Ronneng, Den Norske Ambassade

Skjal 2.

Slag:	Í norskum sjógvi Frá Noregi	Flutt frá USSR	Grátt og USSR óki	Svalbard	Heild
Møguleikar 1989					
Toskur	1700	2400	4000	400	8500
Hýsa	300	300	2500	0	3100
Flatfiskur	-	-	2500	0	2500
Annað	400	300	1500	150	2350
Heild	2400	3000	10500	550	16450
Møguleikar 1988 (ikki minkaðir við 22%)					
Toskur	3400	6500	6100	800	168
Hýsa	950	1800	6600	0	9350
Annað	850	0	0	300	1150
Heild	5200	8300	12700	1100	27300

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 72/1988 (vetrarting): Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1989.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 23. februar 1989 og eftir 1. viðgerð 23. februar beint í marknaðarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Pauli Ellefsen, Suni Jacobsen og Atli P. Dam siga frá, at teir atkvøða fyri báðum tveimum fiskiveiðusáttmálunum.

Teir harmast um tann niðurskurð, framdur er í fiskiveiðumøguleikunum í Barentshavinum, men hesin er av russum og norðmonnum mettur at vera vísindaliga grundaður.

Hin vegin mótmæla teir harðliga, at landsstýrið í býtinum av hesum fiskiveiðumøguleikum í millum norskt og sovjettiskt øki hevur latið seg niðurtelva politiskt av norðmonnum, og hetta uttan at fremja niðurskurð í tí partinum av norskum fiskimøguleikum við Føroyar, sum føroyingar væl høvdu verið førir fyri at nýtt sjálvir, og er her hugsað um eini 2 - 3.000 tons av botnfiski.

Teir halda, at landsstýrið í alt ov lítlan mun hevur nýtt tann partin av talvfólki okkara, sum kundi virka fritt við Bjarnoynna, Svalbard og seint á árinum á gráu leiðini og sovjettiskum øki.

er fyri hendurnar. Aftur viðgongur løgmaður skrivliga, at teir trupulleikar, hann í dag hevur at stríðast við, hevur hann sjálvur og hansara landsstýri skapt.

Vit hava við øðrum orðum ein løgmann, sum óskammaður bjóðar seg fram til at loysa trupulleikar samfelagsins, sum ikki vóru til staðar, tá hann tók við, men sum hann sjálvur hevur skapt, og sum fyri alt tað eru av sama slagi, sum teir trupulleikar, sum hann saman við Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum skapti seinast í sjeytiárunum, og sum sambandslandsstýrið loysti okkum burtur úr fyrra partín av áttatiárunum. Hetta er tann sanna myndin av Føroyum. Lat okkum taka nøkur heilt fá dømir um, hvussu svart løgmaður sjálvur málar gongdina og støðuna í Føroyum nú aftaná, at hansara egna landsstýri hevur virkað ikki bert í 500 dagar, men í heili 4 ár.

Á blaðsíðu 6 undir íðnaði verður millum annað sagt: "spekulatiónirnar fara at hasa av", also hetta er 4 ár aftaná, at landsstýrið tók við. Víðari verður sagt: "Tað verður kanska ringt hjá føroyskum íðnaði, handverki og tænastuvirksemi at fáa fótin fyri seg" o.s.fr., og víðari verður sagt: "Skal virkjunum lív verða lagað, og skulu tey hava framgongd, so verður neyðugt at bøta munandi um arbeiðsumstøðurnar" o.s.fr. Tosað verður eisini um avskeplaða lønarlagið og tvørrandi arbeiðsmegi. Hetta verður ikki sagt í byrjanini av landsstýrisskeiði løgmans, men aftaná, at skeiðið er runnið, og nú verljarin skal geva hesum løgmanni og landsstýri skotsmál fyri útinta politiska verkið.

Undir alivinnuni verður tosað um bakkast oman á bakkast.

Undir viðgerðini av orkuútbyggingini viðgongur løgmaður, at øll hansara ynskir og allar hansara metingar á øllum økjum brustu. Tað, sum Javnaðarflokkurin aftan á seinasta løgtingsval sleit samgongusamráðingarnar uppá, er alt til fánýtis.

Okkara sjóvinna, okkara einasta vinna umfram fiskivinnuna, sum hevur givið positiva bruttofaktorinntøku ella veruliga inntjening til okkara samfelag uttanífrá, fær sera stutta umrøðu.

Vit skulu uppbyggja eina almenna sjóvinnuumsiting, nú sitandi landsstýrið hevur kappað høvdið av hesi vinnu og latið dønum, týskarum og øðrum hesi nýggju og nýmótans føroysku skip at reka við vinningi. Hin vegin sigur løgmaður, at tað almenna hevur skyldu til at stuðla dyggiliga, tá talan er um svartkjaftaskipini, sum

Hesi kundu sett spurnartekin við norskan møguleika fyri at umsita fiskiveiðu í verndarøkinum við Svalbard. Nú fingu vit alt ov stutta tíð til at finna fram til, hvussu nógv norðmenn meta virðið av, at føroyingar sum teir fyrstu vóru til reiðar at góðtaka hendan møguleika teirra.

Politisku tøkkina fingu vit so hesu ferð í gráum kálvskinni frá tjóð, vit hava mett brøðratjóð.

MARKNAÐARNEVNDIN, 23. februar 1989.

Karin Kjølbro | Olaf Olsen | Lasse Klein

Pauli Ellefsen | Atli P. Dam | Suni Jacobsen

Niels Pauli Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TF. 11080 . Telex 81310 lfmto fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardag stongt

1. mars 1989

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 321-6-9

IG/cr

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 73/1988: Keyp av bygningi til Náttúrugripasavnið.

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av bygningi til Náttúrugripasavnið.	lagtingslov om køb af bygning til Naturmuseet.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa matr. nr. 683ø í Tórshavn, fyri 1,8 mió. kr. og at taka upp lán til keypið. 2. stk. Harumframt verður landsstýrinum heimilað at brúka 500.000 kr. til umbygging og at taka upp lán til hetta endamál.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe matr. nr. 683ø i Tórshavn for 1,8 mio. kr. og til at optage lån til købet. 2. stk. Desuden bemyndiges landsstyret til at anvende 500.000 kr. til ombygning og at optage lån til dette formål.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Føroya Náttúrugripasavn hevur fingið álagt rættiliga stórar nýggjar uppgávur seinastu trý árini. Serliga eru at nevna grindakanningarnar. Hesar hava gjørt, at eingin í dag roynir at føra fram ákæru móti føroyingum um at vit ganga grindastovninum ov nær.

Harnæst eru at nevna fjarðakanningar, sum hava avgerandi týdning fyri at meta um árinið av fiskaalingini á firðir og sund og hvussu alingin kann leggjast til rættis, so at umhvørvið verður varðveitt mest møguliga.

Føroya Náttúrugripasavn hevur higartil leigað húsini fyri 10.000 kr./mð., men nú hevur eigarin sagt leigumálið upp til 15. februar 1989 - um so er, at húsini ikki verða keypt.

Føroya Náttúrugripasavn hevur brúk fyri húsunum, og landsstýrið biður við hesum løgtingið um heimild til at keypa húsini fyri 1,8 mió. kr.

Landsstýrið biður samstundis um loyvi til at innrætta húsini fyri 500.000 kr.

Jógvan Sundstein
løgmaður

/
/ Súsanna Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 73/1988 (vetrarting): Keyp av bygningi til Náttúrugripasavnið.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin innkallaði landsarkitektin Gunleyg Durhuus til tess at fáa greiniligari upplýsingar um málið. Landsarkitekturin upplýsti, at grundøkið matr. nr. 683ø er stórt 514 m², støddin av húsinum: bruttovídd 342 m³, nettovídd 311 m³ í trimum hæddum. Húsini eru bygd í 1973 og eru timburhús, klædningur og tekja av aluminium, kjallari av betong. Kvadratmeturprísurin verður kr. 4.386 - tá er umbyggingin ikki íroknað. Til umbyggingina eru brúktar kr. 245.000 av rakstrinum hjá stovninum, og er tí tørvur fyri játtan uppá kr. 255.000 til innrætting og keyp av innbúgvi v.m.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Heini O. Heinesen, Tórbjørn Poulsen, Niels Pauli Danielsen og Flemming Mikkelsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins um at keypa matr. nr. 683ø fyri kr. 1,8 mió. kr., men kann ikki mæla til at játta kr. 500.000 til umbygging, men mælir til, at upphæddin verður kr. 255.000, og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

ti

uppskot landsstýrisins.

Í § 1, 2. stk. verður "500.000 kr." broytt til: "255.000 kr.".	I § 1, stk. 2 ændres "500.000 kr." til: "255.000 kr.".

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen)
mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 14. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð av

løgtingsmál nr. 73/1988 (vetrarting): Keyp av bygningi til Náttúrugripasavnið.

Í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 2 verður sett:
"§ 2. Landsstýrið verður heimilað at nýta 250.000 kr. til umbygging og at taka upp lán til hetta endamál."

2) Sum nýggj § 3 verður sett:
"§ 3. Henda lóg kemur í gildi 31. mars 1989."

I landsstyrets forslag foretages følgende ændringer:

1) Som ny § 2 indsættes:
"§ 2. Landsstyret bemyndiges til at anvende 250.000 kr. til ombygning og at optage lån til dette formål."

2) Som ny § 3 indsættes:
"§ 3. Denne lov træder i kraft 31. marts 1989."

FÍGGJARNEVNDIN. 29. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11000. Telex 81310 tinguu fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

1. mars 1989

F. L. j. nr.
(at ákalla í svari) 809-52-9

SPS/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 74/1988 (Vetrarting): Landskassaveðhald fyri lánum frá "Kreditforeningen af kommuner i Danmark" til førcyskar kommunur.

J p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landskassaveðhald fyri lánum frá "Kreditforeningen af kommuner i Danmark" til førovskar kommunur.

§ 1. Í § 2 í løgtingslóg nre. 24 frá 30. apríl 1987 um landskassaveðhald fyri lánum frá "Kreditforeningen af kommuner i Danmark" til føroyskar kommunur, soleiðis sum broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 9. juni 1988 ganga út orðini " 31. mars 1989" og í staðin fyri verður sett: "31. mars 1990".

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landskassegaranti for lån fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner.

§ 1. I § 2 i lagtingslov nr. 24 af 30. april 1988 om landskassegaranti for lån fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner, som ændret ved lagtingslov nr. 74 af 9. juni 1988, udgår ordene "31. marts 1989" og i stedet indsættes: "31. marts 1990".

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 31. mars 1989.	§ 2. Denne lov træder i kraft 31. marts 1989.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 74 frá 9. juni 1988 varð heimild landsstýrisins saman við fíggjarnevndini sbr. løgtingslóg nr. 24 frá 30. apríl 1986 at veðhalda fyri lánum frá "Kreditforeningen af kommuner i Danmark" til føroyskar kommunur framlongt til 31. mars 1989.

Sjálvt um løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 1987 um býti av rakstraravlopi landskassans hevur økt um Kommunala Lánigrunnin, og hóast løgtingslóg nr. 75 frá 9. juni 1988 um Kommunalan Lánigrunn hevur víðkað nakað um heimildirnar at veita lán úr grunnunum, so verður framvegis tørvur hjá kommununum á at hava møguleika fyri lántøku aðrastaðni.

Avgjørt er tí í landsstýrinum at akjóta upp fyri tinginum at leingja lógina um borgan fyri lánum úr kommunukreditfelagnum.

Í 1988 vórðu veittar hesar borganartilsagnir eftir lógini:

Hvannasunds kommune	2.000.000 kr. netto
Miðvágs kommuna	6.000.000 kr. -
Sands kommuna	11.500.000 kr. -
Vágs kommuna	3.120.000 kr. -
Tilsamans	22.620.000 kr. netto

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmali nr. 74/1988 (vetrarting): Landskassaveðhald fyri lánum frá "Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner".

Málið er framlagt av landsstýrinum 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið

FÍGGJARNEVNDIN, 13. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TIf. 11080 . Telex 81310 vingst fa . Telefax 16942 . Postbanc 64
Afgreiðslutíð kl. 10—15. leygardag stongt

1. mars 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 512-90

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 75/1988: Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

§ 1. Í § 3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20. november 1969 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya við seinni broytingum verða orðini "30. apríl 1989" broytt til "30. apríl 1992".

§ 2. Henda lóg fær gildi frá 30. apríl 1989.

løgtingslov om ændring af lagtingslog om lotteritilladelse til Útvarp Føroya.

§ 1. I § 3 i lagtingslov nr. 71 af 20. november 1969 um lotteritilladelse til Útvarp Føroya med senere ændringer ændres ordene "30. april 1989" til "30. april 1992".

§ 2. Denne lov træder i kraft den 30. april 1989.

Viðmerkingar:

Útvarp Føroya hevur søkt um, at lógin um happadráttarloyvi, sum gongur út 30. apríl 1989, verður endurnýggjað.

Í umsókn um endurnýgging av loyvinum hevur útvarpið upplýst fylgjandi:

Løgtingslóg nr. 22 frá 14. mars 1986 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya fer úr gildi 30. apríl 1989.

Til 776 dráttir eru inngoldnar		57,4 mió. kr.
goldnar í vinningum	24,3 mió. kr.	
skattur til landskassan	3,9 mió. kr.	
	28,2 mió. kr.	
umsitingarútreiðslur	2,1 mió. kr.	30,3 mió. kr.
Útvarpsins partur		27,1 mió. kr.

Landsstýrið loyvir sær at mæla til, at lógin verður framlongd, tá útvarpinum tørvar pening til raksturin.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 75/1988 (vetrarting): Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 13. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TIf. 11080 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Vanlig afgreiðslutíð kl. 10—15, leygardag stongt

2. mars 1989

F. L. j. nr. 1600-3-9

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 76/1988 (Vetrarting): Millumlandasáttmáli um tiltøk móti yvirgangsatgerðum móti skipum v.m.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at millumlandasáttmáli um tiltøk móti yvirgangsatgerðum móti skipum og uppískoytisprotokoll um fastar boripallar á kontinntalsoklinum verður at galda fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Løgmálaráðið hevur um Ríkisumboðið spurt, um Føroyar ynskja at vera við í IMO-millumlandasáttmálanum (IMO = International Maritime Organization) um tiltøk móti yvirgangsatgerðum móti skipum og uppískoytisprotokoll um fastar boripallar á kontinentalsoklinum.

Sambært sáttmálanum hava londini skyldu til deils at áseta hóskandi straff fyri brotsverkini, deils at tryggja, at brotsmenninir verða rættarsóktir, antin við rættarsókn í tí landi, har brotsmaðurin er, ella við at hann verður útflýggjaður til rættarsókn í einum øðrum landi.

Eisini hava luttakaralondini skyldu til at veita hvørjum øðrum hjálp í bardagunum móti hesum brotsverkum og til rættarsókn av brotsmonnunum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

520 / Jalgrím Hilduberg

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 76/1988 (vetrarting): Miljumlandasáttmáli um tiltøk móti yvirgangsatgerðum móti skipum v.m.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í rættarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

RÆTTARNEVNDIN, 21. mars 1989.

Jógvan við Keldu Marita Petersen Eilif Samuelsen

Hans J. Debes Signar Hansen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

2. mars 1989

F. L. j. nr. 10-31

Tlf. 11080. Telex 81310 tinorm fa. . Telefax 14942 . Pósthox 64
Viðvaningstutið: Kl. 10—15. Leygardag stongt

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 77/1988 (Vetrarting): Lutroka Føroya í norðurlendskari avtalu um at veita hjáip tá vanlukkur henda í friðartíð.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at Føroyar skulu taka lut í norðurlendskari avtalu um at veita hjálp tá vanlukkur henda í friðartíð.

Viðmerkingar:

Ríkismálaráðið hevur um ríkisumboðið spurt, um Føroyar kunnu taka undir við avtalu millum Danmark, Finland, Noreg og Svøríki um samarbeiði yvir landamørk fyri at forða ella avmarka skaðar á menniskju, ogn ella umhvørvi, um so er at vanlukkur henda ella vandi er á ferð. (Rammuavtala um at veita hvørjum øðrum hjálp, tá vanlukkur henda í friðartíð).

Í avtaluni stendur m.a.:

Partarnir skulu royna at taka burtur forðingar fyri sovorðnum samarbeiði, ið munnu vera í teirra lóggávu.

Partarnir plikta seg til at veita tá hjálp, ið teir eru førir fyri, og í samsvar við avtaluna.

Ein myndugleiki í einum landi kann venda sær beinleiðis til málsrádda (kompetenta) myndugleika í einum øðrum landi, og tann myndugleiki, sum er biðin um at hjálpa, avger um sovorðin hjálp skal veitast.

Myndugleikarnir í tí landi, ið hevur biðið um hjálp, hevur tá fullu ábyrgdina av leiðsluni av hjálpararbeiðinum, uttan tá vanlukkustaðið liggur inni á økinum hjá einum øðrum landi.

Tað landið, ið hevur biðið um hjálp, skal bera útreiðslurnar av hjálpararbeiðinum, og hevur ábyrgdina av tí skaða, hjálpandi landið ger. Eisini skal landið, ið hevur biðið um hjálp, veita endurgjald fyri deyð ella persónskaðar, ið hendu á manningina hjá hjálpandi landinum, og endurgjald fyri skaða á útbúnað.

Tað landið, ið veitir hjálp, ber ábyrgdina av skaða, ið hendir innanfyri egin landamørk.

Avtalupartarnir skulu geva hvørjum øðrum upplýsingar av týdningi fyri hesa avtalu, um skipanina av bjargingartænastu, um teir málsráddu myndugleikarnar, um lóggávu og annars um broytingar av týdningi fyri avtaluna. Eisini skulu londini arbeiða fyri at samarbeiðið á hesum øki verður framt.

Sagt verður eisini í avtaluni, at gingið verður út frá, at teir málsráddu myndugleikarnir í hvørjum landi hava beinleiðis samband hvør við annan, og at fundir verða hildnir, tá tørvur er.

Málið hevur verið til ummælis hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, ið mælir til, at vit verða við í tílíkum samarbeiði.

Viðmerkjast kann, at Ísland tekur undir við avtaluni, meðan Grønland hevur boðað frá, at avtalan verður mett ikki at hava praktiskan týdning fyri Grønland.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/

/Kjartan Hoydal

Á l i t

i

løgtingsmáli nr.77 /1988 (vætrarting): Luttøka í norður-landskari avtalu um at veita hjálp, tá vanlukkur henda í friðartíð.

Málið er framlagt av Føroya landsstýri tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í rættarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

RÆTTARNEVNDIN, 21. mars 1989.

Jógvan við Keldu Marita Petersen Eilif Samuelsen

Hans J. Debes Signar Hansen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tf. 11080 . Telex 81310 lingns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
vgnsskiftistíð kl. 10—15. Ieygardag stongt

2. mars 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 508-3

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 78/1988: Veiting av ríkisborgararætti.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 349 frá 1. juli 1988 og lóg nr. 678 frá 8. november 1988 um veiting av ríkisborgararætti, verða lýstar at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevndu lógir verða lýstar at galda í Føroyum.

Eftir lóg nr. 678 frá 8. november 1988 verður eisini veittur 3 persónum, búsitandi í Føroyum, ríkisborgararættur.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 78/1988 (vetrarting): Veiting av tíkis-borgararætti.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í rættarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

RÆTTARNEVNDIN, 21. mars 1989.

Jógvan við Keldu Marita Petersen Eilif Samuelsen

Hans J. Debes Signar Hansen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11050 . Telex 81310 finans fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Viðtalstímar: kl. 10—15. Ikki leygardag summar

2. mars 1989

F. L. nr.
at tilskila í svari 10-4-2-1

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 79/1988: Sáttmáli Europaráðsins til vernd móti pínslu v.m.

U p p s k o t

til

samtykt

Løgtingið góðkennir, at sáttmáli Europaráðsins til vernd móti pínslu og ómenniskjansligari ella vanvirðisligari viðferð ella revsing verður góðkendur uttan fyrivarni fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur frá ríkisumboðnum fingið fyrispurning, um Føroyar kunnu taka undir við sáttmála Europaráðsins til vernd móti pínslu v.m.

Endamálið við sáttmálanum er at tryggja, at persónar, ið verða frátiknir teirra persónligu frælsi av einum almennum myndugleika, ikki koma fyri pínslu og ómenniskjansligari ella vanærandi viðferð, og fevnir sáttmálin m.a. um stovnar ella líknandi, har persónar eru í varðhaldi, sita fongsulsrevsing, eru fyrisitingarliga fræsistiknir ella hildnir aftur av læknafrøðiligum orsøkum.

Landsstýrið loyvir sær við hesum at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Finnbogi Isakson
landsstýrismaður

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr.79/1988 (vetrarting): Sáttmáli Europaráðsins til vernd móti pínslu v.m..

Málið er framlagt av Føroya landsstýri tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í rættarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir tinginum til at seta sáttmála Europaráðsins til vernd móti pínslu v.m. í gildi.

RÆTTARNEVNDIN, 21. mars 1989.

Jógvan við Keldu Marita Petersen Eilif Samuelsen

Hans J. Debes Signar Hansen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

2. mars 1989

F. L. j. nr.
[illegible] 453-1

Tlf. 11000 . Telex 81310 lingas fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Lvgreiðslutíð kl. 10—15, Levering stemet

KA/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 20/1988 (Vetrarting): Avtøka av løgtingslóg um avgjald á laksi, veiddum á landleiðini.

Uppskot

til

Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um avgjald á laksi, veiddum á landleiðini.	lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om afgift av laks, fisket på fiskeriterritoriet.
§ 1. Løgtingslóg nr. 68 frá 21. mai 1980 um avgjald á laksi, veiddum á landleiðini verður sett úr gildi. Stk. 2. Avgjald fyri veiðitíðina 1988/89 verður ikki uppkravt.	§ 1. Lagtingslov nr. 68 af 21. maj 1980 om afgift på laks, fisket på fiskeriterritoriet træder ud af kraft. Stk. 2. Afgift for fiskeri i tidsrummet 1988/89 bliver ikke opkrævet.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt miseydnaðist laksaveiðan seinastu veiðitíð

Tískil komu fleiri av laksaskipunum í búskaparligar trupulleikar. Fleiri skip hava biðið um at sleppa undan at gjalda avgjaldið, eisini fyri í fjør, sum er ein króna fyri hvørt kilo av veiddum laksi.

Tá raksturin av hesum partinum av flotanum er heldur vánaligur, og hesir bátar eru teir einastu í flotanum, sum gjalda avgjald fyri ávísa veiðu, verður skotið upp at avtaka laksaavgjaldið.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/
/

Kjartan Hoydal

Á l i t

1

<u>løgtingsmáli nr. 80/1988 (vetrarting): Avtøka av løgtingslóg um avgjald á laksi, veiddum á landleiðini.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins tó við hesi broyting, at avgjaldið fyri veiðitíðina 1987/88, eins og landsstýrið hevur skotið upp fyri 1988/89, heldur ikki verður kravt. Samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, 2. stk. í uppskoti landsstýrisins verður soljóðandi:
"<u>2. stk.</u> Avgjald fyri veiðitíðina 1987/88 og 1988/89 verður ikki uppkravt."

§ 1, stk. 2 i landsstyrets forslag formuleres således:
"<u>Stk. 2.</u> Afgift for fiskeri i tidsrummet 1987/88 og 1988/89 opkræves ikke."

FISKIVINNUNEVNDIN, 14. mars 1989.

Jógvan Durhuus | Olaf Olsen | Tórbjørn Poulsen

Jógvan Olsen | Henrik Old | Jógvan A. Johannesen

Niels Pauli Danielsen

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 81/1988 (vetrarting): Skattalætti av útleiging av býli.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:

Sum nýggj § 33, nr.13 verður sett:

"Persónur, sum leigar út kamar ella íbúð til fólk, sum eru undir útbúgving ella í læru, kann draga alla goldna leigu frá fyri - kamar tó treytað av, at hetta er 9 m² ella meira til viddar, við atgongd til wc, bað og køk, og at kostnaðurin fyri nýtslu av kamarinum er 1.000,- kr. ella minni um mánaðin,

lagtingslov um ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

Som ny § 33, nr. 13 indsættes:

"Person, som udlejer værelse eller lejlighed til folk under uddannelse eller i lære kan fradrage den totale betalte leje for - værelse på betingelse af, at dette har en størrelse af 9 m² eller mere med adgang til wc, bad og køk-ken, og at udgifterne for benyttelse af værelset er 1.000,- kr. eller mindre

umframt kostnað fyri nýtslu av el, olju og telefon,
- fyri íbúð tó treytað av, at íbúðin hevur 2 rúm ella meira og ikki er undir 20 m² til viddar, fyriuttan wc, bað og køk, og at kostnaðurin fyri nýtslu av íbúðini pr. m² er 50 kr. ella minni, umframt kostnað fyri el, olju og telefon.
- Annars kann persónur, sum leigar út kamar við atgongd til wc, bað og køk ella íbúð, sum hevur wc, bað og køk til fólk, sum ikki er undir útbúgving ella í læru, draga helvtina av goldnari leigu fyri búðstað frá treytað av, at kostnaðurin fyri nýtslu av bústað pr. m² er 60 kr. ella minni, umframt kostnað til nýtslu av el, olju og telefon.

pr. måned. excl. udgifter for el, olie og telefon,
- for lejlighed dog på betingelse af, at lejligheden har 2 rum eller mere og ikke er under 20 m² stort, foruden wc, bad og køkken, og at prisen for benyttelse af lejligheden pr. m² er 50 kr. eller mindre, excl. udgifter for el, olie og telefon.
- Desuden kan person, som udlejer værelse med adgang til wc, bad og køkken eller lejlighed, som har wc, bad og køkken til folk, som ikke er under uddannelse eller i lære, fradrage halvdelen af betalt leje for bolig dog på betingelse af, at udgifterne for benyttelse af bolig pr. m² er 60 kr. eller mindre, excl. udgifter til benyttelse af el, olie og telefon.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter kundgørelse.

Viðmerkingar:

Hóast tann veruleika, at tað verða bygd so nógv sethús her á landi sum ongantíð áður, og hóast tað, at nógv eldri hús verða umbygd, so er tørvurin fyri at leiga íbúðir og kømur

- - størri enn nakrantíð. Hesin tørvurin er sum vera man størstur í Havnini, men er eisini á teimum størru bygdunum.

Ein hópur av ungfólki kemur til Havnar at ganga í skúla ella í læruplass fyri eina longri ella stytri tíð.

Nakrar fáir skúlar hava skúlaheim, t.d. Studentaskúlin, Tekniski skúlin, Sjúkrasystraskúlin og Læraraskúlin, men hesi skúlaheim saman við bústaðarhúsunum í Børkugøtu og í Fjalsgøtu nøkta bert ein lítlan part av tí tørvi, sum er.

Ynskjandi hevði verið, at fleiri bústaðarhús eins og tey í Børkugøtu vórðu bygd eftir teimum lagaligu treytunum í lógini um bústaðarhús til fólk í útbúgving frá 1983.

Tey flestu sethúsini, ið bygd eru hesi seinastu árini, eru sera rúmlig, og eingin ivi er um, at her eru nógv rúm, ið kundu verið leigað út bæði sum íbúðir til familjur og sum kømur til einstaklingar.

Tað er heldur eingin ivi um, at fólk, ið annars kundu hugsað sær at hjálpt upp á støðuna við at leiga út, aftra seg, tí tey vita, at nakað av trupulleikum standast av at hava leigarar, men størsta forðingin er, at skatturin fer við einum stórum parti av inntøkuni, og skal nakað fáast burturúr, so má leigan setast so høgt, at tað skapar stórar trupulleikar hjá leigarunum.

Byggivirksemið í landinum er í løtuni sera høgt. Hetta førir við sær, at eftirspurningurin á handverkarum, tilfari og tænastum økist nógv, og tað ber aftur við sær, at lønir og prísir eru nógv uppfarin.

Ein munandi lætti í skattingini av útleiging hevði uttan iva virkað við til, at fleiri fóru at leiga út, og at dygdin á teimum útleigaðu rúmunum gjørdist betri, og harvið hevði tað ovurstóra trýstið á nýbygging linkað nakað.

Fyri at bøta um tann stóra tørvin, sum er fyri íbúðum og kømrum, og fyri at gera tað rímuliga lønandi hjá fólki at leiga út og samstundis at halda leiguna niðri á einum rímuligum støði, setir Sambandsflokkurin fram hetta uppskot um broyting í skattalógini.

FØROYA LØGTINGI, 8. mars 1988.

Eilif Samuelsen

Á l á t

í

løgtingsmáli nr. 81/1988 (vetrarting): Skattalætti av útleiging av býli.

Málið er framlagt av sambandsflokkinum tann 8. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 10. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tórbjørn Poulsen, Signar Hansen, John Petersen og Atli P. Dam) mælir til, at málið verður sent landsstýrinum við áheitan um, at hetta verður gjølliga kannað, og undirstrikaði Atli Dam, at málið er sera trupult at viðgera og inniber skattligar avleiðingar, sum torført er at hava eftirlit við, og ætlaða lóggávan kann tískil tí koma at virka beint í móti tí, sum ætlað varð við uppskotinum.

Minnilutin (Sune Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskot sambandsfloksins, í øðrum lagi tekur hann undir við omanfyri nevnda meiriluta.

SKATTANEVNDIN, 16. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Signar Hansen John Petersen

Sune Jacobsen Atli Dam

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 33/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjøld.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjøld.	Lagtingslov um ændring i lagtingslov om ekstra indførselsafgift.
§ 1.	§ 1.
Í § 2 í Løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinri broytingum um eykainnflutningsgjøld verður frammanfyri orðini: "skip yvir 20 br. reg. tons" sett orðini "gassolja og tungolja".	I § 2 i lagtingslov nr. 32 fra 19. maj 1979 om ekstraindførselsafgift sættes foran ordene "skibe over 20 br. reg. tons" ordene: "gasolie og tungolie".
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1988.	Denne lov træder i kraft 1. januar 1988.

Viðmerkingar.

Føroyska fiskivirnan er í fíggjarligari trongstøðu. Hetta er ikki minst galdandi fyri heimafiskiskapin, sum er grundarlagið undir flakavirkjunum.

Galdandi eykainnflutningsgjald upp á 6% er í stóran mun við til at økja um útreiðslurnar hjá fiskiførunum.

Nevnast kann, at hetta avgjaldið eisini liggur á oljuni, sum SEV nýtir til el-framleiðslu. Hetta økir um útreiðslurnar hjá flakavirkjunum og øðrum fiskavirkjum og minkar samstundis um fiskaprísirnar.

Ein lækkan av olju- og elprísinum hevði lætt um hjá okkara íðnaði.

Bæði olja og el eru neyðsynjarvørur í øllum húsarhaldum, høgir el- og oljuprísir tyngja munandi um húsarhaldið, serliga hjá pensjónistum og øðrum við lítlari inntøku.

Sagt hevur verið frá hesari samgonguni, at tað skal førast ein meiri liberalur politikkur, vinnan skal ikki loftast, um hon kemur illa fyri fíggjarliga, men so má vinnan eisini fáa meiri liberalar umstøður at virka undir, so má tað almenna halda uppat við at krevja avgjøld av fiskivinnuni og tvinga hana út av tí fíggjarligu eggini, so hon fer í skeljasor.

Tað kann ikki vera rætt at leggja stór avgjøld á eina vinnu, sum frammanundan ikki fær endarnar at røkka saman, hetta er í veruleikanum at leggja skatt á rakstrarligt undirskot hjá vinnuni at nýta til alment forbrúk.

Umrødda broyting í eykainnflutningsgjaldinum minkar landskassans inntøkur við umleið 20-25 mió. kr.

Á FØROYA LØGTINGI, 9. mars 1988.

Jógvan í. Olsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 83/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjøld.

Málið er framlagt av sambandsflokkinum tann 14. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 15. mars beint í skattanevndina.

Nevndin skipaði seg, og varð Tórbjørn Poulsen valdur til formann.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Tórbjørn Poulsen, Signar Hansen og John Petersen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein minnilutin (Sune Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskot sambandsfloksins.

Ein annar minniluti (Atli P. Dam) tekur ikki undir við uppskotinum frá sambandsflokkinum.

SKATTANEVNDIN, 16. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Signar Hansen John Petersen

Sune Jacobsen Atli Dam

SAMBANDSFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 84/1998(vetrarting): Nýggj lóggáva um nýggjar reglur um trygging í Føroyum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til nýggja lóggávu og nýggjar reglur fyri trygging í Føroyum.

Skotið verður upp, at tryggingarsamtakið verður liðað sundur soleiðis, at tær einstøku deildirnar fáa loyvi til at tekna tryggingar innan tey ymisku tryggingarøkini. Peningur, bundin og vunnin frá trygging, eigur framvegis at verða verandi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Sambandsflokkurin hevur fleiri ferðir fyrr skotið upp, at tryggingarsamtakið verður liðað sundur, og at tær einstøku tryggingardeildirnar fáa loyvi til at tekna tryggingar innan tey ymisku tryggingarøkini. Á hendan hátt ber til at fáa eina ávísa kapping innan hetta øki.

Í dag hava vit fleiri deildir innan tryggingarsamtakið, har lógir og reglugerðir so at siga ikki eru broyttar síðani stovnanina.

Allir teir størru flokkarnir hava seinastu árini, tá Sambandsflokkurin hevur reist hetta mál, verið samdir um, at tryggingarnar skulu samsvara nútímans tryggingarprinsippum og harvið tæna tryggingartakaranum (brúkaranum). Sí løgtingsmál nr.

67/1985 og nr. 29/1987, men semjan hevur bert rokkið har til, at áleggjast skuldi landsstýrinum at endurskoða lógir og reglur, men síðani hevur løgtingið hvørki hoyrt orð ella eið.

Eingin ivi er um, at einkarrættirin er ein høvuðsorsøkin til, at vit eru eftirbátar á tryggingarøkinum í mun til okkara grannalond.

Á FØROYA LØGTINGI, 10. mars 1988.

Sunc Jacobsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 84/1988 (vetrarting): Nýggj lóggáva um nýggjar reglur um trygging í Føroyum.

Málið er framlagt av Sambandsflokkinum tann 10. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 14. mars beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Marita Petersen, Hans Jacob Debes, Signar Hansen og Jógvan við Keldu) tekur ikki undir við uppskoti sambandsfloksins, men vísir á, at nevnd, vald av landsstýrinum, arbeiðir við málinum. Meirilutin heitir á landsstýrið um at áleggja nevndina at koma við álitinum til ólavsøku, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fram álit í málinum í Ólavsøkutingsetuni.

Ein minniluti (Eilif Samuelsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

RÆTTARNEVNDIN, 21. mars 1989.

Jógvan við Keldu — Marita Petersen — Eilif Samuelsen

Hans J. Debes — Signar Hansen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11080 . Telex 81310 lagms fa . Telefax 14942 . Postbanki nr.
Vanligur skrivstovutími: kl. 10—15, leygardag stongt

10. mars 1989

F. L. j. nr. 1820-32

EJ/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 85/1988 (Vetrarting): Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands og nýtekning av partapeningi í P/F Floglejðir.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands og nýtekning av partapeningi í P/F Floglejðir.	lagtingslov om garanti for lån til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands og nytegning af aktiekapital i P/F Floglejðir.
§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands uppá 75 mió. kr. ella mótvirðið av hesi upphædd í fremmandum gjaldoyra.	§ 1. Landsstyret er bemyndiget til på landskassens vegne at garantere for lån til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands på 75 mio. kr. eller modværdien af nævnte beløb i udenlandsk valuta.
§ 2. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at hækka sín partapening í P/F Floglejðir við 9.750.000	§ 2. Landsstyret er bemyndiget til på landskassens vegne at forhøje sin aktiekapital i P/F Floglejðir

kr. og at lána neyðugan pening til hetta endamál.	ned 9.750.000 kr. og til at låne nødvendig kapital til dette formål.
§ 3. Henda lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt fingu føroyingar í lag samvinnu við danska flogfelagið Cimber Air A/S við tí fyri eyga at fáa skipað eitt sjálvstøðugt føroyskt flogfelag. Partafelagið Atlantic Airways, Faroe Islands varð stovnað 10. november 1987. Cimber Air A/S átti 49% av hesum felag og føroyska "holdingfelagið" partafelagið Flogleiðir 51%.

Leikluturin hjá Cimber Air var at læra føroyingar at flúgva. Roknað varð við, at hetta fór at taka nøkur ár, og avtalað varð millum partarnar, at so hvørt, sum felagið mentist, skuldu Flogleiðir yvirtaka størri part av felagnum frá Cimber Air.

Henda virkætlan hevur gingið nógv betur, enn roknað varð við. Tað hendi so tað, at Mærskair fekk dømt Cimber Air til at fara burturúr samvinnuni við føroyingar. Hetta gjørdi, at øll segl vóru sett fyri at gera føroyska felagið sjálvbjargið so skjótt sum møguligt. Og longu 22. desember 1988 varð komið á mál í so máta, og Atlantic Airways varð av flogferðslumyndugleikunum góðkent sum sjálvstøðugt flogfelag og fekk øll tey neyðugu loyvini til at reka flogferðslu.

17. februar 1989 var fundur millum føroyingar og Cimber Air. Partarnir vóru samdir um, at Cimber Air hevði lokið starv sítt í sambandi við uppbyggingina av føroyska felagnum, og tað varð avgjørt, at Flogleiðir longu nú skal yvirtaka partapeningin uppá 980.000 kr., sum Cimber Air eigur í Atlantic Airways, fyri áljóðandi virði, eins og føroyingar skulu taka við veðhaldsskylduni, sum Cimber Air hevur fyri lántøku hjá Atlantic Airways. Flogleiðir fer sostatt einsamalt at eiga Atlantic Airways.

Partaeigarar í Flogleiðir eru landsstýrið við 75% og P/F Flogsamband við 25% av partapeninginum uppá 1.200.000 kr.

Ætlanin er nú at hækka partapeningin í Atlantic Airways við 12 mió. kr. og harvið eisini í Flogleiðir, so hann verður tilsamans 16 mió. kr. og svarar hetta til umleið 10% av skuldini hjá Atlantic Airways. Landskassans partur (75%) er settur til at vera 9.750.000 kr., so P/F Flogsamband fær høvi til at seta 3.250.000 kr. svarandi til 25% av hækkingini. Seinni eigur Atlantic Ayrways at umhugsa at hækka partapeningin við friari tekning.

Avtalað er, at føroyingar skulu yvirtaka veðhaldsskylduna skjótast møguligt. Umráðandi er tí, at málið fær eina skjóta viðgerð og at lógin verður staðfest og kunngjørd áðrenn 1. apríl 1989.

Karl Heri Joensen
Landsstýrismaður

/

/Eyðfinnur Jacobsen

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 85/1988 (vetrarting): Veðhald fyri láni til P/f Atlantic Airways, Faroe Islands og nýtekning av partapeningi í P/f Flogleiðir.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 10. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 14. mars beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Atlantic Airways og hevur fingið handaðan rakstrarrokn-skap felagsins fyri tíðina frá stovnan til 31. december 1988 og fíggjár- og rakstrarætlan fyri 1989.

Á fundinum varð eisini upplýst, at tað nú ikki er neyðugt, at landsstýrið veðheldur fyri meira enn 70 mió. kr.

Á fundinum settu umboðini fyri Atlantic Airways ynski fram um, at møguleikar skuldu gerast fyri at býta sum gjald-oyra (konvertera) og/ella lángevara, um fyrimunir - sum tíðin líður - skuldi verið í hesum. Hesum tekur fíggjarnevndin undir við og vísir á, at lógartekturin ikki forðar fyri tí.

Fíggjarnevndin hevur fingið ta fatan, at vónir eru fyri, at raksturin av føroyska flogfelagnum framyvir kemur at bera seg - alt annað líka - um skynsamiliga verður atborið.

Fíggjarnevndin vil sostatt mæla løgtinginum til at veita landsstýrinum umbidnu heimildina at veðhalda, hóast upp-hæddin er stór.

Fíggjarnevndin vísir annars á, at orðingin í uppskoti landsstýrisins ikki fastsetir, hvat peningurin, sum veðhildið verður fyri, skal nýtast til.

Fíggjarnevndin setir tí fram uppskot um nýtt 2. stk. í § 1, hvørs orðaljóð knýtir tað givna veðhaldið beinleiðis til fíggingina av flogfari felagsins, sum er skrásett við kenni-bókstøvunum CYCRG.

Eisini verður lagt fast, at vehildni parturin av láni-num skal skrásetast fram ímóti 1. veðrætti upp á kr. 75 mió.

Víst verður annars á, at tað undir 1. viðgerð av upp-skotinum varð komið inn á spurningin, hvørt útskeínking av ókeypis rúsdrekka er samsvarandi føroyskari löggávu ella ikki.

Nevndin mælir landsstýrinum til at gera neyðugar kanningar í so máta.

Ein samd figgjarnevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir annars fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1 verður orðað soleiðis:

"Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til P/f Atlantic Airways, Faroe Islands upp á 70 mió. kr. ella mótvirðið av hesi upphædd í fremmandum gjaldoyra.

2. stk. Lánið, ið veðhildið verður fyri, verður at nýta til fígging av felagsins flogfari - OYCRG - og fær skrásettan veðrætt aftan á kr. 75 mió. ella mótvirðið av hesi upphædd í fremmandum gjaldoyra í hesum flogfari."

§ 1 formuleres således:

"Landsstyret er bemyndiget på landskassens vegne at garantere for lån til P/f Atlantic Airways, Faroe Islands på 70 mio. kr. eller modværdien af nævnte beløb i udenlandsk valuta.

Stk. 2. Lånet, for hvilket der ydes garanti, skal anvendes til finansiering af selskabets fly - OYCRG - og får registreret panteret næst efter kr. 75 mio. eller modværdien af dette beløb i udenlandsk valuta i dette fly."

FÍGGJARNEVNDIN, 30. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 86/1988 (vetrarting): Um serskatting av hjúnafelaga.

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður Føroya landsstýri at leggja fyri Føroya Løgting uppskot um broytingar í skattalógini, sum føra við sær, at heimaarbeiðandi hjúnafelagi verður skattaður av helminginum av inntøkuni upp til eina vanliga ársløn fyri ófaklærdan.

Viðmerkingar:

Meira enn eina ferð fyrr hevur Sambandsflokkurin mælt til, at heimaarbeiðandi hjúnafelagar verða serskilt skattaðir av helvtini av inntøkuni upp til eina vanliga ársløn fyri ófaklærdan.

Hendar broyting stillar nøkur teknisk krøv til skattaumsitingina, men ikki fleiri enn at hesi lættliga kunnu loysast.

Orsøkin til, at Sambandsflokkurin ikki tók hesa broyting við í seinasta samgongugkeiði sínum, er, at tá fór fram ein total umlegging av okkara skattaskipan til samtíðarskatt.

Tí var hildið ráðiligt at bíða við hesi broyting.

Nú so long tíð er frálíðin, síðan umleggingin til samtíðarskatt varð liðug, mælir Sambandsflokkurin til, at henda týdningarmikla og átrokandi broyting verður gjørd sum skjótast.

Út frá hesum viðmerkingum verður sett fram hetta.

Á FØROYA LØGTINGI, 10. mars 1989.

Agnar Nielsen

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 86/1988 (vetrarting): Um serskatting av hjúnafelaga.

Málið er framlagt av sambandsflokkinum tann 10. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 14. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tórbjørn Poulsen, Signar Hansen og John Petersen) vísir til, at sitandi samgonga í samarbeiðsskjalinum hevur sett sær tann setning, at spurningurin um serskatting av hjúnafelaga skal kannast nágreiniliga, og tá sostatt verður arbeiðitt við málinum innan samgonguna, verður málið at beina landsstýrinum.

Minnilutin (Atli Dam og Sune Jacobsen) mælir til, at skattanevndin arbeiðir víðari við málinum sum millumtinganevnd, og undirstrikaði Atli Dam, at málið er sera fløkt, og at arbeiðið fer at krevja nógva tíð, skal eitt nýtiligt álit leggjast fyri tingið og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at skattanevndini arbeiðir víðari við málinum sum millumtinganevnd og leggur málið fram eftir ólavsøku.

SKATTANEVNDIN, 16. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Signar Hansen John Petersen

Sune Jacobsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. [illegible]. Telex [illegible] stevns in. Telefax [illegible]. Postboks [illegible]
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardaga stongt

10. mars 1989

F. L. j. nr.
[illegible] 331—17

KH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 87/1988 (Vetrarting): Broyting í løgtingslóg um Vaktar- og Bjargingartænastuna.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Vaktar- og Bjargingartænastuna.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om Vagt- og Bjærgningstjenesten.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 83 frá 24. oktober 1978 um vaktar- og bjargingartænastu verður gjørd henda broyting:	I lagtingslov nr. 83 af 24. oktober 1978 om vagt- og bjærgningstjeneste foretages følgende ændring:
§ 1, stk. 2 verður soljóðandi:	§ 1, stk. 2 formuleres således:
"Stovnurin fyrisitir vaktartænastuni sambært føroyskari fiskivinnulóggávu. Stovnurin fyrisitir bjargingartænastuni á føroyskum sjóøki. Stovnurin kann gera avtalur um samstarv hesum viðvíkjandi við aðrar	"Institutionen administrerer vagttjeneste ifølge færøsk fiskerilovgivning. Institutionen administrerer bjærgningstjenesten på det færøske søterritorium. Institutionen kan indgå samarbejdsaftaler med han-

lands- og ríkismyndugleikar og onnur."	syn til dette med andre lands- og rigsmyndigheder og andre."
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Samsvar er ikki millum umsitingina av føroysku reglunum viðvíkjandi fiskivinnuni og lóg nr. 83 frá 24. oktober 1978 um Vaktar- og Bjargingartænastuna.

Sambært øllum kunngerðum, sum hava heimild í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini, hevur Vaktar- og Bjargingartænastan (V&B) ábyrgdina av, at allar fiskireglur verða hildnar. Somuleiðis er sambært avgerð landsstýrisins V&B tann stovnur, sum tekur ímóti øllum rapporteringum frá útlendskum skipum og frá skipum undir føroyskum flaggi, sum fara uttan fyri landleiðina at fiska.

Tað er landsstýrisins meting, at ábyrgdin skal liggja á einum stað fiskivinnueftirlitinum viðvíkjandi. V&B kann so, sum tørvur verður mettur á, gera samstarvsavtalur við onnur, herundir Færøernes Kommando.

Viðvíkjandi bjarging er eingin føroysk lóggáva. Millumlandasamstarv er um hetta og luttekur V&B í hesum.

Landsstýrið metir á sama hátt, at ábyrgdin eigur at liggja á einum stað, og einasta náturliga er, at henda liggur hjá einum stovni undir landsstýrinum, sum hevur allar fyritreytir fyri at fremja hesa uppgávuna, við serkunnleika til viðurskiftini um okkara leiðir og tætt samstarv við føroyska fiski- og sjóvinnu og stovnar í landinum.

Sostatt verður við hesum ábyrgdin løgd púra greitt hjá einum landsstovni, sum er førur fyri at røkja hesa uppgávu. Síðani verður tað uppgávan at skipa fyri tílíkum skilagóðum samstarvi við aðrar stovnar, herundir Færøernes Kommando, at bjargingararbeiðið altíð er so væl fyri sum gjørligt, sjófólki okkara til trygdar.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/
/ Kjartan Hoydal

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 87/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um Vaktar- og Bjargingartænastuna.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 14. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 15. mars beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur havt fund við Anfinn Kallsberg, landsstýrismann, og við Jóhan Ziskason, leiðara av Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagt. 16. mars 1989 heitt á landsstýrið um samráðingarfund til tess at lýsa, hvussu landsstýrið við fyriliggjandi lógaruppskoti ætlar at loysa tær ymsu uppgávurnar, sum Vaktar- og Bjargingartænastan og Færøernes Kommando røkja viðvíkjandi fiskivinnueftirlitinum og bjargingartænastuni. Eftir áheitan frá fiskivinnunevndini kom Bent Klinte, ríkisumboðsmaður, á fund og greiddi nærri frá málinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Durhuus, Olaf Olsen, Tórbjørn Poulsen og Niels Pauli Danielsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera reglugerð og neyðugar avtalur, áðrenn lógin verður sett í gildi.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen, Henrik Old og Jógvan Adolf Johannesen) heldur, at tað var betri, um ein samstarvsavtala varð gjørd millum Vaktar- og Bjargingartænastuna og Færøerres Kommando, sum síðan varð løgd fyri løgtingið til góðkenningar, og setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at skipa fyri samráðingum millum Vaktar- og Bjargingartænastuna og Færøernes Kommando til at gera eina samstarvsavtalu og at leggja hetta samstarvsuppskotið fyri løgtingið til góðkenningar á ólavsøku 1989.

FISKIVINNUNEVNDIN, 29. mars 1989.

Jógvan Durhuus Olaf Olsen Tórbjørn Poulsen

Jógvan Olsen Henrik Old Jógvan A. Johannesen

Niels Pauli Danielsen

SAMBANDSFLOKKURIN

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 89/1988 (vetrarting): Fyriskipan ímóti dálking av firðum.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta nevnd at kanna teknisku og fíggjarligu møguleikarnar at gera rørleiðingar ella aðra fyriskipan, ið kann tryggja, at mest møguligt umhvørvisligt, skaðiligt frárensl, ið kemur út í firðir við alivinnu, verður veitt út av firðunum út á straumasjógv ella verður gjørt óskaðiligt á annan hátt.

Viðmerkingar:

Føroyingar sum heild vænta sær nógv av alivirnuni í komandi tíðum, og tann fiskur, sum er í brúkunum, á firðum og víkum, væntast at viga samanlagt eini 10.000 tons í 1990, og hava eitt fyrsta honds søluvirði uppá umleið 500 mió. kr. Hetta ljóðar alt sera gott, og er eisini ein kærkomin møguleiki hjá okkum føroyingum, men alt hevur sínar veiku síður, soleiðis eisini alivinnan. Størstu vandarnir eru sjúkurnar, dálkingin og fyri ikki at tala um umdømi okkara hjá keyparum, sum í síðsta enda eru teir, ið avgera, hvar og frá hvørjum keypast skal. Her eru kendu vanligu kappingareglurnar galdandi eftirspurningur og útboð, góður kvalitetur úr reinum umhvørvi er altíð góð reklama.

Okkum tørvar at gera nakað munagott fyri, at vit skulu varðveita hetta umdømi.

Hesin, um vit kalla hann trupulleiki, at vit ala fisk á

somu firðum og sundum, sum vit hava bygt okkara heim, skúlar, skipasmiðjur, servicestøðir, iðnaðarvirkir o.a. sjálvandi av náttúrligym orsøkum, tí her er best at búleikast, veðurbest vart fyri brim o.s.fr. Búsetingin er har og alingin eisini, bæði, hava vit ynski um, skulu mennast. Tí kunnu vit ikki bara lata standa til, men eiga alt fyri eitt at fara undir at loysa hetta átrokandi mál.

Hesin sonevndi trupulleiki, at vit ala við somu strendur, har vit eisini búgva og hava annað virksemi, er júst, tí landið er lítið, alimøguleikarnir avmarkaðir og avstandirnir smáir. Hetta er samstundis okkara styrki, og tí eisini tað lættari at loysa. Tá ið arbeiðið skal førast út í lívið, fara sjálvandi spurningarar taka seg upp, í hvønn mun kommunur, land og virkir verða uppií, og eisini er ójavnt sum kommunur vara av aliøkjum o.s.fr.

Ætlanin við hesum uppskoti er at heita á landsstýrið um at skipa fyri, at spurningurin um at gera rørleiðingar ella aðrar fyriskipanir at halda firðir og sund so trí fyri dálking, sum til ber, verður kannaður, so at vit kunnu tryggja, at alivinnan kann menna seg til ta høvuðsvirnu, sum hon hevur líkindi til at gerast.

Á FØROYA LØGTINGI, 13. mars 1989.

Edmund Joensen

Álit

1

Løgtingsmáli nr. 89/1988 (vetrarting): Fyriskipan móti dálking av firðum.

Málið er framlagt av sambandsflokkinum tann 14. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 15. mars beint í umhvørvisnevndina.

Umhvørvisnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 29. mars 1989, og í tí sambandi var Signar Hansen, landsstýrismaður í umhvørvismálum á fundi við nevndina, og greiddi landsstýrismaðurin frá tí, at landsstýrið í løtuni arbeiðir við á hesum ógvuliga týðandi øki.

Ein samd nevnd ásannar, at talan er um eitt ógvuliga týðandi mál, ið eigur at vinna frama skjótast, og eftir at verða kunnað um, hvat landsstýrið ger í umhvørvisspurningunum, setir nevndin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at kanna teknisku og fíggjarligu møguleikarnar at gera rørleiðingar ella aðra fyriskipan, ið kann tryggja, at mest møguligt umhvørvisligt, skaðiligt frárensl, ið kemur út í firðir við alivinnu, verður veitt út av firðunum út á streymasjógv ella verður gjørt óskaðiligt á annan hátt, og verður frágreiðing í málinum at leggja fyri ólavsøkutingið.

UMHVØRVISNEVNDIN, 29. mars 1989.

Poul Michelsen John Petersen Magni Arge

Marita Petersen Edmund Joensen

21. mars 1989

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 90/1988: Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

§ 1.

Í § 1, stk. 2, pkt. 1) í løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988 um ávísar skúlar verður gjørd hesa broyting:
"Gymnasiala útbúgving í Gøtudali í Eysturoy" verður broytt til: "Gymnasiala útbúgving á Kambsdali.".

§ 2.

Hesa lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om bestemte skoler.

§ 1.

I § 1, stk. 2, pkt. 1) i lagtingslov nr. 62 af 9. juni 1988 om bestemte skoler foretages følgende ændring:
"Gymnasial uddannelse i Gøtudali i Eysturoy" ændres til: "Gymnasial uddannelse i Kambsdali.".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Tá ið samráðingar vórðu førdar um at skipa landsstýri, varð m.a. málið um bygging av HF- og studentaskúla í Eysturoynni umrøtt.

Í undirskjali samgongunar varð niðurfelt: Kannað verður eftir teim fyrimunum, peningaliga og undirvísingarliga, sum standast av at byggja Studentaskúlan nærhendis Handilsskúlanum í Eysturoynni. Eru fyrimunir, verður málið loyst samsvarandi kanningarúrslitinum.

Í samband við at landsstýrið skuldi velja eitt umvoð í eina 3-mannanevnd til at fyrireika byggingina av HF- og studentaskúlanum í Eysturoy, heitti landsstýrið samstundis á nevndina um at gera tær kanningar, ið vórðu niðurfeldar í samgonguskjalið. Hini bæði umboðini í nevndini vóru fyri á-vikavist Landsskúlafyrisitingina og HF- og Studentaskúlan í Eysturoy.

Tann 6. mars leggur nevndin fram álit í málinum.

Í samband við byggikostnaðin sigur nevndin í álitinum sínum m.a., at verður skúlin bygdur í Gøtudali, verður kostnaðurin mettur til 43.900.000 kr.

Verður skúlin bygdur á Kambsdali, tó ikki sambygdur við Handilsskúlan, verður kostnaðurin mettur til 34.400.000 kr., t.v.s. 9,5 mió. kr. bíligari.

Verður skúlin harafturímóti bygdur saman við Handilsskúlanum, verður kostnaðurin mettur til 29.100.000 kr. ella 14,8 mió. kr. bíligari enn um bygt verður í Gøtudali.

Orsøkin til at byggiútreiðslurnar verða so munandi lægri um bygt verður saman við Handilsskúlanum er m.a., at skúlarnir kunnu nýta nøkur høli í felag, sum t.d. kantinu, 2 skúlastovur, pæd. verkstað, verkstað til húsarørd, ið verður mett til umleið 300 fermetrar (4,8 mió. kr.). Harumframt gerst ikki neyðugt við tveimum fimleikahallum, men bert tí einu, ti ætlanin er at nýta ítróttarhøllina, ið Gøta, Lorvík og Fuglafjørður eiga í felag. Eisini verður nakað av uttanduraøki felags og gevur tað eina sparing uppá umleið 500.000 kr. Á Kambsdali er vegur gjørdur, stórt parkeringsøki, allar tekniskar íbindingar klárar, sum kloakk við reinsiverki, vatni, telefon og el.

Um rakstrarútreiðslurnar sigur nevndin, at samanumtikið verður roknað við einum ódýrari rakstri við sambygging. Upphædd úr 600.000 til 900.000 kr., alt eftir, hvussu langt ein vil ganga í samstarvinum, verður nevnt.

Uppá fyrispurning um tað eru undirvísingarligir fyrimunir við at sambyggja, sigur nevndin, at tað eru sera góðir møguleikar fyri undirvísingarligum fyrimunum við at skúlarnir liggja so nær saman sum møguligt:

- vit kunnu í ávísan mun hava felags lærarar
- ikki neyðugt við ferðing millum skúlarnar
- nýta tilfeingið meira rationelt
- bjóða lærugreinir ella modulir hvør til annan
- spara ávísum næmingum tíð
- veita øðrum betri rættindi
- nýggjar útbúgvingar
- gera føroyskar royndir.

Byggjanevndin hevur á fundi við Handilsskúlan viðgjørt spurningin um at byggja skúlan nær nýggja Handilsskúlanum, har næmingaheim Handilsskúlans skuldí byggjast. Nevnast skal, a Handilsskúlin hevur fingið ávist annað stað nærhendis at byggja ætlaðu íbúðirnar á. Niðurstøða Handilsskúlans varð, at hann í prinsippinum góðtekur at nýggi HF- og Studentaskúlin kann byggjast á nevnda øki undir ávísum treytum, sum t.d. útsjónd o.a.

Landsstýrið heldur, at rætta leiðin at ganga er ein sambygging við Handilsskúlan, ið hevur undirvisingarligar fyrimunir við sær, samstundis sum stórar peningaupphæddir verða spardar í byggi- og rakstrarútreiðslum.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

P A R T
Á l á t

1

løgtingsmáli nr. 90/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 30. mars beint í mentanar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (..... ....., Hergeir Nielsen, Olaf Olsen og Suni Jacobsen) mælir tinginum til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan Adolf Johannessen) vísir á, at álitið frá 3-mannanevndini viðvíkjandi bygging av nýggjum studentaskúla og HF-skeiði í Eysturoy hevur ikki sannført hann um, at tað er rætt at flyta skúlan úr Gøtudali inn á Kambsdal.

Í fyrstu atløgu sær tað kanska ógvuliga eggjandi út, at spardar verða o.u. 15 mió. kr. við at byggja saman við Handilsskúlanum á Kambsdali, men hinvegin ivist eg í, at fyrimunirnir viðvíkjandi frálæru, sum eru umrøddir í álitinum, í veruleikanum fara at halda.

Tíverri er tað soleiðis, at ofta vísir tað seg, at langt er ímillum ástøði og "praksis". Og alt ov ofta hava mynduleikarnir í hesum oyggjum havt lyndi til at vera ov bjartskygdir í so máta.

Tí kann Javnaðarflokkurin ikki taka undir við uppskoti landstýrisins, men vísir til tingmál nr. 134/1987.

MENTANNAR- OG SKÚLANEVNDIN, 31. mars 1989.

Hergeir Nielsen — Olaf Olsen

Suni Jacobsen — Jógvan Adolf Johannessen

RESPONSUM

viðvíkjandi framløgu av partáliti í løgtingsmáli nr. 90/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar.

Heimildin fyri meirilutan í mentannar- og skúlanevndini at leggja fram partálit ella álit í fyriliggjandi máli er í § 8 í tingskipanini - sum in extenso er soljóðandi:

"Tá nevnd er vald, hevur fyrst valdi limurin skyldu at boða nevndini til fundar. Á hesum fundi verður nevndin skipað. Formaður nevndarinnar er framsøgumaður hennara við framløgu av álitum og øðrum nevndararbeiði."

Henda regla er normerandi fyri eina vanliga álits avgreiðslu, og er tá ein sjálvsøgd regla, at formaðurin vegna ávikavist samda nevnd ella meiriluta er framsøgumaður. Hetta er ein heilt náttúrlig skipan fyri, at tingið aftur fær tey mál til viðgerðar, ið beind eru í nevnd við tí fyri eyga at avgreiða álitið.

Tingskipan Føroya Løgtings hevur 17 kapitlar, og samlaða greinatalið er 24, og sýnir hetta, at reglurnar eru lagdar í ein fáorðaðan karm, og má tí ofta ivi koma fram um tulkingar, tá tvídráttur verður, um hvussu tingskipanin skal fremjast í verki. Í avvarðandi løgtingsmáli er einki útfyllandi tilfar, ið kann vera ein stuðul til at skilja týdningin av hvørjari greinini sær. Dentur er lagdur á eina neyva orðing.

Sostatt sigur tingskipanin einki um, hvat gerast skal, tá ósemja er um framløgu av áliti, in casu at nevndarformaðurin sýtir fyri at undirskriva uppskot til álit, sum ein meiriluti í nevndini er samdur um.

NIÐURSTØÐA:

Í fyriliggjandi føri, har nevndarformaðurin er í

minniluta, og niðurstøðan hjá einum meiriluta er ein støðutøka til álit at leggja fram fyri tingið, er tað skylda nevndarinnar at avgreiða málið aftur til løgtingið, og hesa heimild eigur tá meirilutin aftan fyri sítt álit, og nevndarformaðurin kann ikki við heimild í § 8 sýta fyri, at meirilutaálitið verður lagt fyri tingið.

Tá tingskipan Føroya Løgtings, sum áður ávíst, er nakað stuttorðað og serstakliga vísir tørv fyri, at skipaðar verða ávísar reglur, ið kunnu loysa trupulleikar í tulkingini, sum kunnu hugsast at taka seg upp í parlamentariska orðaskiftinum, og sum tingformaðurin skal taka støðu til, skal verða upplýst, at løgtingsskrivstovan tann 3. apríl 1989 setti seg í samband við Folketingssekretæriatet í danska fólkatinginum, og er henda skrivstovan hægsti myndugleiki í løgfrøðiligum spurningum viðvíkjandi grundlógini, ríkislógum og tingskipan fólkatingsins v.m.

Haðani varð upplýst, at teir eru púra samdir í teirri tulking, ið løgtingsskrivstovan hevur um § 8, sum omanfyri tilskilað, og varð eisini sagt frá, at formansskapurin í fólkatinginum í mong ár hevur hildið seg til hesa tulking. Fólkatingið hevur til tíðir endurskoðað tingskipan sína, og í juni 1981 varð í fólkatinginum samtykt at broyta tilsvarandi grein í donsku tingskipanini, við at fylgjandi var skoytt uppí:

"I § 8, stk. 9, indsættes efter sidste punktum:

"Tidspunktet for afgivelse af betænkning over et forslag fastsættes i tilfælde af uenighed i udvalget af dettes flertal.""

LØGTINGSSKRIVSTOVAN, 5. apríl 1989.

Kristoffur Thomasen
skrivstovustjóri

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

21. mars 1989

F. L. j. nr. 407-2-8-1

FR 110 Tórshavn. Telex 81310 fmgovs fa. Telefax 14942. Postbox 64
Viðtalstímar: kl. 10—15. Ikke gyldige sammen

NF/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 91/1988: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.	Lagtingslov om ændring i lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 22 frá 30. apríl 1987 verður gjørd hesa broyting:	I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v., som ændret ved lagtingslov nr. 22 af 30. april 1987 foretages følgende ændring:
Sum nýggj § 13 a verður sett:	Som ny § 13 a indsættes:
"Gjald fyri burturbeining. Til burturbeining av teimum í §§ 3, 4, 5, 6, 7a, 7b, 8 og 9 nevndu akførum verður landsstýrinum heimilað at áseta eitt gjald, sum	"Bortskaffelsesafgift. Til bortskaffelse af de i §§ 4, 5, 6, 7a, 7b, 8 og 9 omtalte køretøjer bemyndiges landsstyret til at fastsætte en afgift, som betales i fond ved første

Landsstýrið fær við lógarbroytingini heimild til at fyriseta nærri reglur um, hvussu útgjaldingin úr grunninum skal fara fram.

Nøkur tøl:

Úr "RUSKINNSAVNAN" hjá IRF juli 1987 er yvirlit yvir bilvrak í Føroyum:

Ár	1976	1977	1978	1979	1980	1981	1982	1983	1984	1985	1986
Nýggj motor-akfør	1529	1733	1899	1503	1259	1118	1248	1742	2093	1785	2417
Tøkir	963	922	1393	732	472	393	360	993	1094	980	1287
Bilvrak	566	811	506	771	787	725	888	749	999	805	1130

Sambært Hagdeildini var samlaða akfarstalið tann 1. januar 1989 18.895 eindir. Hetta er alt akfør, sum eru undir skrásetingarskyldu, t.e. persón-, last-, vøru-, viðfestivognar og bussar.

Meðallívialdurin á bilum í Føroyum er umleið 7 ár, so roknast kann við 2.000 bilvrakum um árið tey komandi árini. Sambært motorkontórinum hjá fútanum fóru 1.964 akfør úr skrásetingini í 1988.

Signar Hansen
landsstýrismaður

/

/Klaus Hermann

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 91/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

UMHVØRVISNEVNDIN, 29. mars 1989.

Poul Michelsen John Petersen Magni Arge

Marita Petersen Edmund Joensen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14943 . Postboks 64
Viðtalstíðir: Kl. 10—15, leygardag stongt

22. mars 1999

F. L. j. nr.
Vit tiskila í svari 1212-3

JH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 92/1988: Veðhald fyri lánum til Førova fíggjargrunn og Menningargrunnin.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til Førova fíggjar-grunn og Menningargrunnin.	lagtingslov om garanti for lån til Førova fíggjar-grunnur og Menningar-grunnurin.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri uttan-landslánum til Føroya fíg-gjargrunn og Menningar-grunnin svarandi til 40 mió. kr. til hvønn grunnin.	§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for udenlands-lån til Føroya fíggjar-grunnur og Menningar-grunnurin svarende til 40 mio. kr. til hver fond.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Frá Føroya fíggjargrunni og frá Menningargrunninum hevur landsstýrið fingið umsóknir um at landskassin veðheldur fyri uttanlandsláni.

→ 2 F

Grunnarnir hava í boði lán uppá mótvirði av 40 mió. kr. í ECU til eina rentu uppá o.u. 8,2%. Lánini eru tillutað Føroyum sum partur av regionallánsskipanini hjá Nordisk Investeringsbank, sum fevnir um partar av norðurlondum m.a. Føroyar.

Grunnarnir hava tørv á nevndu lánum, sum mugu metast at vera lagalig, tá ECU liggur næst donsku krónuni og hevur lítið og einki kurstap við sær. Annars verður tað mett rætt at hava gott samband við Norðurlendska Íløgubankan og taka við lánkvotuni, ið verður tillutað Føroyum, um lánitreytirnar eru lagaligar.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Grunnarnir hava í boði lán uppá mótvirði av 40 mió. kr. í ECU til eina rentu uppá c.u. 8,2%. Lánini eru tillutað Føroyum sum partur av regionallánsskipanini hjá Nordisk Investeringsbank, sum fevnir um partar av norðurlondum m.a. Føroyar.

Grunnarnir hava tørv á nevndu lánum, sum mugu metast at vera lagalig, tá ECU liggur næst donsku krónuni og hevur lítið og einki kurstap við sær. Annars verður tað mett rætt at hava gott samband við Norðurlendska Íløgubankan og taka við lánkvotuni, ið verður tillutað Føroyum, um lánitreytirnar eru lagaligar.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 92/1988 (vetrarting): Veðhald fyri lánum til Føroya Íðnaðargrunn og Menningargrunn.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskotið.

Nevndin viðmerkir, at eftir áskoðan hennara átti landsstýrið at havt lagt fram tvey lógaruppskot, tá talan er um lánheimildir til tveir ymiskar stovnar. Hetta eigur landsstýrið at leggja sær í geyma, sjálvt um søkt verður um fleiri lánheimildir frá sama lángevara.

FÍGGJARNEVNDIN, 30. mars 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 21. mars 1989

Tlf. 11080. Telex 62310 fogmi fa. Telefax 14942. Postbox 64
Viðtalstímar: kl. 10—15. Ferðarundur vitanligt

T. L. j. nr. 430-12-45-16

JK/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 93/1988: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 2 verður skoytt uppí sum 4. punktum:
"Fyri persónar, sum eru umfatað ir av § 1, nr. 3) í samtíðarskattalógini, verður persónsfrádráttarin frá og við inntøkuárinum 1989, 6.000 kr."
2) § 4, 1. pkt. verður

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 3, stk. 2 tilføjes som 4. punktum:
"For personer, der er omfattet af § 1, nr. 3) i kildeskatteloven, bliver personfradraget fra og med indkomståret 1989, 6.000 kr.
2) § 4, pkt. 1 affattes således:

Í løgtingslóg nr. 34 frá 28. juni 1999 um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, varð § 8 broytt á tann hátt, at avmarkað skattskyldug, sum í einum inntøkuári bert hava A-inntøku, skuldu rinda 35% av bruttoinntøkuni í skatti. Reglan var sett, tí stór ónøgd var millum fólk, at útlendingar ikki rindaðu skatt av arbeiðsinntøku teirra í Føroyum. Broytingin nú frá 35% til 42% er orsakað av, at arbeiðsstøðan í Føroyum enn gev, at føroyskir arbeiðarar eru ónøgdir við, at útlendsk arbeiðsmegi ikki rindar skatt á hædd við teirra føroysku arbeiðsfelagar. Tí er upphæddin sett til 42%, ið er meðalskattaprosentið í Føroyum.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/ Valgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 93/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskotið.

SKATTANEVNDIN, 30. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81316 ringes fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Viðgerðsumið: Kl. 10—15. leygardag vitjanir

21. mars 1989

F. L. j. nr.
tað tilmælið í svarinum 430-12-45-16

JK/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 94/1988: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í § 2, stk. 2 í løgtingslóg nr. 49 frá 26. mai 1988 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt verður dagfestingin "17. mars" broytt til: "1. juli".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I § 2, stk. 2 i lagtingslov nr. 49 af 26. maj 1988 om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat ændres datoen "17. mars" til "1. juli".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Broytingin í hesi lóg er orsakað av, at Føroya Løgting broytti dagfestingina í uppskotinum til løgtingslógina, nevniliga frá framløgudegnum 17. mars 1988 til 1. juli, men av misgáum var broytingin ikki rættað og sostatt skeivt kunngjørd.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 94/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskotið.

SKATTANEVNDIN, 30. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11080 . Telex 81310 tinghs fo . Telefax 13942 . Postbox 64
Viðtalstími: kl. 13—15. Iesgkrogge stonuri

21. mars 1989

F. L. j. nr.
um inskila i svari 430-12-45

JK/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 95/1988: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, nr. 3) fellur burtur.

2) Sum nýtt nr. 3) í § 1 verður sett:

"Lesandi og lærlingar uttanlands, sum áðrenn lestur ella læru hava havt fastan bústað í Føroyum í minst 4 ár. Líkningarráð Føroya verður heimilað við kunngerð at áseta nærri

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1, nr. 3) ophæves.

2) Som nyt nr. 3) i § 1 indsættes:

"Studerende og lærlinge udenlands, der inden studierne eller læren har haft fast bopæl på Færøerne i mindst 4 år. Ligningsrådet bemyndiges til i bekendtgørelse til at fast- sætte nærmere regler om definition af

reglur um heitið lesandi, lærlingar, prófførslur o.a. í hesum sambandi."

3) § 1, nr. 8), 1. punktum verður orðað soleiðis: "Partafeløg og onnur feløg, skrásett í Føroyum, har ikki allir felagsmenn ábyrgjast persónliga fyri skuldbindingar felagsins"

4) § 21, stk. 3 verður orðað soleiðis: "Hóast reglurnar í stk. 1 kann fyrsta roknskaparskeið ikki fevna um meira enn 18 mánaðir, kann ikki røkka aftur um 1. januar í tí álmanakkaári, felagið er stovnað og ikki fevna um meira enn tvey álmanakkaár."

5) Í § 28, stk. 3 verður sett sum 2. punktum: "Reglan í 1. punktum er galdandi, sjálvt um løntakarin síðani verður avmarkað skattskyldugur."

6) Í § 33, nr. 7 verður aftaná orðið "persóni" skoytt uppí: "undir fullari skattskyldu".

7) § 33 nr. 8), a) - g) verður orðað soleiðis: "hjá persóni undir fullari skattskyldu, sum

studerende, lærlinge, bevis m.m. i denne sammenhæng."

3) § 1, nr. 8, 1. punktum affattes således: "Aktieselskaber og andre selskaber, indregistreret på Færøerne, i hvilke ikke alle deltagerne hæfter personligt for selskabets forpligtelser"

4) § 21, stk. 3 formuleres således: "Uanset bestemmelserne i stk. 1 kan første regnskabsperiodes længde ikke omfatte mere end 18 måneder, kan ikke strække sig længere tilbage end til 1. januar i det kalenderår, selskabet er stiftet og kan ikke omfatte mere end to kalenderår."

5) I § 28, stk. 3 tilføjes som 2. punktum: "Reglen i 1. punktum gælder, selv om lønmodtageren herefter bliver begrænset skattepligtig."

6) I § 33, nr. 7 tilføjes efter ordet "personlige": "fuldt".

7) I § 33 formuleres nr. 8), a) - g) således: "hos en person under fuld skattepligt, der

hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, ein upphædd í samband við ferðing millum bústað og arbeiðsstað. Frádráttur verður veittur eftir reglunum í a) - g).

a) Uttan mun til, hvussu ferðast verður millum bústað og arbeiðsstað, verður loyvdur frádráttur fyri ferðing eina ferð aftur og fram um dagin við ávísari upphædd fyri hvønn kilometur av vegalongdini millum bústað og arbeiðsstað. Verður arbeitt fyri fleiri enn ein arbeiðsgevara sama dag, verður frádráttur loyvdur fyri hvørt tænastuviðurskifti sær eftir reglunum í hesi lógargrein. Frádrátturin er avmarkaður til eina upphædd, sum er ájøvn við lønina í hvørjum arbeiðsviðurskifti. Ferðing í samband við útbúgving, skúla og skeið verður ikki mett sum ferðing millum bústað og arbeiðsstað.

har lønindtægt, herunder indtægter ved partsfiskeri, et beløb i forbindelse med befordring mellem bopæl og arbejdsplads. Fradraget ydes efter reglerne i a) - g)."

a) Uden hensyn til, hvordan befordringen mellem bopæl og arbejdsplads foretages, tillades fradrag for befordring en gang frem og tilbage daglig med et fast beløb for hver kilometer, som vejafstanden er mellem bopæl og arbejdsplads. Arbejdes der samme dag for mere end en arbejdsgiver, tillades særskilt fradrag for hvert tjenesteforhold efter reglerne i denne paragraf. Fradraget kan dog ikke overstige indtægten i hvert enkelt tjenesteforhold. Befordring i forbindelse med uddannelse, skole og kursus anses ikke for at være befordring mellem bopæl og arbejdsplads.

b) Vejlængden er an-

b) Vegalongdin er talið av kilometrum, sum sambært almenna uppmáting myndar fjarstøðuna millum bygdir í Føroyum. Við arbeiðsstað er at skilja tann staðið, har arbeiðið verður gjørt, sum treytar lønina.

c) Fyri ferðing sjóvegis millum bústað og arbeiðsstað verður frádrátturin loyvdur svarandi til ferðakostnaðin eina ferð aftur og fram um dagin við almenna ferðasambandinum á hægsta avsláttarstigi fyri persónin uttan flutningstól. Frádrátturin sambært reglunum í a) og c) verður tó bert loyvdur í tann mun, samanlagda upphæddin fer upp um eina ávísa upphædd, sbr. g).

d) Fyri ferðing millum bústað í Føroyum og arbeiðsstað uttanlands verður, umframt frádráttirnir samb. a) og c), loyvdur frádráttur svarandi til skjalprógvaðan

talliet af kilometer, som i henhold til offentlig opmåling udgør afstanden mellem bygder på Færøerne. Ved en arbejdsplads forstås det sted, hvor arbejdet, der betinger lønnen, bliver udført.

c) For befordring ad søvejen mellem bopæl og arbejdsplads, tillades et fradrag, der svarer til billetprisen med størst rabat for personen uden befordringsmiddel en gang frem og tilbage daglig. Fradraget efter reglerne i a) og c) tillades dog kun i den udstrækning, det samlede fradrag overstiger et nærmere fastsat beløb, jfr. g).

d) For befordring mellem bopæl på Færøerne og en i udlandet beliggende arbejdsplads, tillades, foruden fradrag efter reglerne i a) og c), et fradrag svarende til dokumenteret

ferðaseðlakostnað. Frádrátturin verður tó bert loyvdur í tann mun, samanlagda upphæddin fer upp um ávisa upphædd, sbr. g).

e) Giftur persónur, sum flytir í aðra kommunu í Føroyum at arbeiða har, fær frádrátt fyri tvinnanda húsarhald, soleiðis at loyvdur verður ein ávisur mánaðarligur frádráttur fyri leigu av høli og ein ávisur frádráttur um dagin fyri eykaútreiðslur til kost. Frádráttur-in er treytaður av at ikki ber til at koma aftur og fram millum bústað og arbeiðsstað dagliga. Frádrátturin er bert loyvdur í tann mun samanlagda upphæddin fer upp um ávisa upphædd sbr. g).

f) Persóni, sum við loyvi frá landsstýrinum hevur útvegað sær avlamisakfar eftir reglunum í

billetpris. Fradraget tillades dog kun i den udstrækning, det overstiger et nærmere fastsat beløb, jfr. g).

e) En gift person, der flytter i en anden kommune på Færøerne end bopælskommunen for at arbejde der, kan få fradrag for dobbelt husførelse, således at der tillades et månedligt fradrag for leje af værelse og et fast fradrag om dagen for merudgifter til kost. Fradraget er betinget af at det ikke er muligt at komme frem og tilbage mellem bopæl og arbejdsplads dagligt. Fradraget tillades dog kun i den udstrækning, det overstiger et nærmere fastsat beløb, jfr. g).

f) En person, der med landsstyrets tilladelse har erhvervet sig en invalidebil efter reglerne i

løgtingslóg um innflutningsgjald, og sum nýtir avlamisakfarið til ferðing millum bústað og arbeiðsstað, verður umframt frádráttirnir í a), c), d) og e) loyvdur ein fastur frádráttur uppá 7.800 kr. um árið, tó í mesta lagi ájavnt við lønarinntøkuna aftaná løntakarafrádrátt. Frá og við 1. juli 1989 verður frádráttsurin, galdandi fyri komandi inntøkuár, pristalsviðgjørdur við pristalinum 1. juli 1989 sett til 100. Tann frádráttur, sum varð lýstur at galda fyri 1988, verður eisini at galda fyri 1989.

g) Tær føstu upphæddirnar, ið nevndar eru í a), c), d), e) og f) verða ásettar av Líkningarráðnum í seinasta lagi 1. juli galdandi fyri komandi inntøkuár."

8) § 33, nr. 11) fellur burtur.

9) § 33, nr. 12) verður

lagtingslov om indførselsafgifter, og som benytter denne i forbindelse med befordring mellem hjem og arbejdsplads, tillades, udover fradragene under a), c), d) og e) et fast fradrag på 7.800 kr. om året. Fradraget kan dog ikke overstige indtægten efter lønmodtagerfradrag. Fra og med 1. juli 1989 bliver fradraget pristalsreguleret med pristallet pr. 1. juli 1989 sat til 100 og gælder for det kommende indkomstår. Det fradrag, der er bekendtgjort som gældende for 1988, skal også gælde for 1989.

g) De faste beløb, der er nævnt i a), c), d), e) og f) fastsættes af Ligningsrådet senest den 1. juli som gældende for det kommende indkomstår.

8) § 33, nr. 11) udgår.

9) § 33, nr. 12) bliver herefter § 33, nr. 11).

sostatt § 33, nr. 11).

10) Í § 78, stk. 2 verður "12%" broytt til: "9%".

11) Í § 78, stk. 3 verður "1. oktober" broytt til: "1. desember".

12) Óbroytt.

13) Í § 78, stk. 4 verður "1. oktober" broytt til: "1. desember".

14) § 78, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"Er tann írestandi skatturin við iskoyti eftir stk. 2 5.000 kr. ella meira, fellur øll upphæddin til gjaldingar í trimum javnstórum gjøldum, hin 1. oktober, 1. november og 1. desember í álíkningarárinum við somu gjaldsfreist sum B-skattagjøldini fyri hesar mánaðir. Er endaliga uppgerðin útskrivað 1. september í álíkningarárinum ella seinri, fella gjøldini til gjaldingar tann 1. í hvørjum av teimum trimum komandi mánaðunum. Goldið verður bert í heilum krónum."

15) Í § 79, stk. 3 verður "12%" broytt til "9%".

16) Í § 79, stk. 4, 1. og 2. pkt. verður "1. desember" broytt til: "1.

10) I § 78, stk. 2 ændres "12%" til: "9%".

11) I § 78, stk. 3 ændres "1. oktober" til: "1. desember".

12) I § 78, stk. 3 ændres ordene "senest 1. oktober" til: "inden 1. oktober".

13) I § 78, stk. 4 ændres "1. oktober" til "1. desember".

14) § 78, stk. 5 affattes således:
"Udgør restskatten med tillæg efter stk. 2 5.000 kr. eller derover, forfalder beløbet til betaling i tre ens rater, den 1. oktober, 1. november og 1. december i slutligningsåret med samme forfaldsdage og betalingsfrister som B-skatteraterne for disse måneder. Er slutopgørelsen først udskrevet efter 1. september i slutligningsåret, forfalder raterne dog først til betaling den 1. i hver af de nærmest følgende tre måneder. Af hver rate opkræves kun det hele kronebeløb."

15) I § 79, stk. 3 ændres "12%" til: "9%".

august".

17) Í § 80, stk. 1 verður "1. oktober" broytt til: "1. juni".

18) Í § 80, stk. 2 verður "1. oktober" broytt til: "1. juni".

19) Í § 80, stk. 3 verður "1. oktober" broytt til "1. juni".

20) Í § 80, stk. 3, 3. punktum verða orðini "1. januar í árinum aftaná líkningarárið" broytt til : "1. september í líkningarárinum".

21) Í § 80, stk. 4 verður "1. oktober" broytt til: "1. juni".

22) § 89, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Felags skattaskráseting'in sendir beint aftaná 1. oktober kommunala líkningarvaldinum ein lista, sum er eins og tann, ið nevndur er í § 88, men nú við endaligu inntøkuni hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara."

23) § 89, stk. 4 verður strikað.

24) Í § 105, stk. 2 verður skoytt uppí sum nýtt 2. punktum:
"Henda freist kann tó

16) I § 79, stk. 4, 1. og 2. punktum ændres "1. desember" til "1. august".

17) I § 80, stk. 1 ændres "1. oktober" til: "1. juni".

18) I § 80, stk. 2 ændres "1. oktober" til: "1. juni".

19) I § 80, stk. 3 ændres "1. oktober" til: "1. juni".

20) I § 80, stk. 3, 3. punktum ændres ordene "1. januar i året efter slutligningsåret" til: "1. september i slutligningsåret".

21) I § 80, stk. 4 ændres "1. oktober" til: "1. juni".

22) § 89, stk. 1 formuleres således:
"Umiddelbart efter den 1. oktober tilsender det fælles skattekartotek de kommunale ligningsmyndigheder en liste, der er identisk med listen , nævnt i § 88, men indeholdende den endelige indkomst for hver enkelt skattepligtig."

23) § 89, stk. 4 udgår.

24) I § 105, stk. 2 tilføjes som nyt 2. punktum:

ikki leingjast útum 15. august í álíkningarárinum."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd. Tó koma pkt. 1), 6) og 7) í gildi 1. januar 1990 og pkt. 2) og 8) eru galdandi fyri inntøkur frá 1. januar 1989.

"Denne frist kan dog ikke forlænges udover 15. august i slutligningsåret."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. Dog træder pkt. 1), 6) og 7) i kraft 1. januar 1990 og pkt. 2) og 8) er gældende for indkomst fra 1. januar 1989.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broytingar í skattalógini hevur til endamáls fyrst og fremst at dagføra skattalógina, so at hon svarar til tíðarinnar krøv um at gera skattaásetingina rættvisari og skattaálíkningina einfaldari.

Nakrar prinsipiellar broytingar eru tó, og kann m.a. nevnast, at broytingin í § 1 um skatting av persónum, sum hava tilhald í Grønlandi ávisa tíð, hevur við sær, at reglur um tilhald í Grønlandi fara at svara til reglurnar um tilhald í øðrum londum.

Broytingin viðvíkjandi lesandi hevur við sær, at reglurnar um lesandi koma einans føroyskum lesandi til góðar, og ikki sum nú eisini útlendingum.

Reglurnar um koyrifrádráttin eru gjørdar einfaldari við tað, at dentur verður lagdur á fráleikan í km millum bústað og arbeiðsstað.

Reglurnar um at framskunda ársuppgerðina hava til endamáls, at skattaborgararnir skjótari verða kunnaðir um úrslitið av álíkningini, og skjótari fáa tann pening aftur, sum teir hava til góðar hjá landskassanum, meðan landskassin skjótari kann fáa tann pening inn, ið hann hevur til góðar hjá borgarunum.

Víst verður annars til tær serstøku viðmerkingarnar, ið eru til hvørt einstakt punkt í hesum lógaruppskoti:

1) Í § 1, 3) í skattalógini verð ásett, at persónar, sum fáa sær tilhald í Grønlandi í minni enn 2 ár, vóru undir fullari skattskyldu í Føroyum, meðan persónar, sum eru giftir og hava húski eftir í Føroyum, og sum halda til í Grønlandi í minst 2 ár, bert verða skattaðir av helvtini av inntøkuni og kunnu draga helvtina av skattinum, sum er goldin í Grønlandi av hesi inntøku, frá. Skotið verður tí upp at strika hesa lógargrein og framyvir meta Grønland sum øll onnur lond, sum flutt verður til og úr.

Henda regla er ring at umsita hjá skattavaldinum, tá hesir persónar eftir galdandi lóg skulu hava høvi til at bíða við at gjalda skattin, til tað verður staðfest, um teir hava verið longri ella stytri enn 2 ár í Grønlandi. Eisini er tað trupult at staðfesta, undir hvørjum umstøðum tilhaldið í Grønlandi hevur vart longri enn 2 ár, tá ið hesir persónar oftast hava ta skipan, at teir eru heima í frítíð o.l. í upp til 5 mánaðir av árinum. Grønland hevur nú eina skattaskipan, sum er alment góðkend, og er skattatrýstið har um at koma upp á somu hædd sum í hinum norðanlondum.

Stórur mismunur verður her gjørdur millum føroyingar, sum fiska undir Grønlandi við skipum, skrásettum í Føroyum, og føroyingum, sum fiska við skipum, skrásettum í Grønlandi, tí teir fyrru rinda fullan skatt av allari inntøkuni í Føroyum. Her skal eisini havast í huga, at talan er um tær stóru inntøkurnar, har helvtin verður ikki skattað í Føroyum.

Føroyingar, sum eru umborð í grønlendskum skipum, rinda skatt haryvuri undir avmarkaðari skattskyldu, og verða teir mettir fult skattskyldugir í Føroyum, fáa teir eftir vanligum reglum fullan ella partvísan lætta í føroyska skattinum fyri tann grønlendska skattin. Samstundis verður vanliga reglan um skjalprógvaða flyting til Grønlands galdandi. Ein persónur, sum veruliga flytir til Grønlands at búgva, kann tá sleppa undan skattskylduni í Føroyum, um hann kann prógva, at hann kemur undir fulla skattskyldu í Grønlandi. Her skal eisini havast í huga, at í samskifti við øll onnur lond enn

Grønland er tann regla galdandi, at persónur skal hava verið uttanlands í meira enn 4 ár, áður enn skattskyldan í Føroyum verður endaliga slept, meðan núgaldandi regla fyri flyting til Grønlands bert ásetur, at persónur skal hava verið burtur í meira enn 2 ár, áðrenn skattskyldan verður slept endaliga.

2) Mælt verður til at broyta § 1 í skattalógini soleiðis, at persónar, sum fara úr Føroyum í lestrar- ella læruørindum, kunnu verða standandi í Føroyum sum fult skattskyldugir, so leingi lesturin ella læran varir. Hetta er ikki tvungið, men ein og hvør kann melda seg úr hesi skipan, um hann vil, men skal tá koma undir skattskyldu í landinum, hann lesur ella lærir í. Treytin fyri at koma undir hesa reglu er, at hann, sum fer úr Føroyum í lestrar ella læruørindum, skal framman-undan hava búð í Føroyum í minsta lagi í 4 ár. Samstundis verður skotið upp at strika lestrarfrádráttin í § 33, nr. 11.

Tá ið løgtingið viðtók reglur um lestrarfrádrátt, var ætlanin, at hann skuldi vera ein hjálp hjá føroyingum, sum fóru burtur at læra. Men nú er støðan hon, at øll, sum koma til Føroyar og kunnu prógva, at tey eru lesandi ella í læru, fáa henda lestrarfrádrátt. Hetta gevur skattaumsitingini stórt eykaarbeiði, serliga summarmánaðirnar og mangan er ilt at meta um, um upplýsingarnar, viðkomandi hava við sær, eru oftir-farandi.

Eykaútreiðslan, sum møguliga verður av hesum, fer so ríkiliga at verða vunnin aftur, av tí at tá fellur lestrarfrá-drátturin burtur fyri allar útlendingar. Ein fyribils upptelj-ing av skattaárinum 1988 visir, at umleið 450 útlendingar hava verið her í 1988. Teir hava hvør fingið 20.000 kr. í lestrar-frádrátti, og um allir hava nýtt henda frádrátt til fulnar, so svarar tað til 9 milliónir krónur í inntøku, sum eru farnar óskattaðar av landinum.

3) Eftir galdandi lóg eru felløg undir fullari skatt-skyldu, um tey eru skrásett í Føroyum og ikki allir felagsmenn ábyrgjast persónliga og sum býta avlopið í lutfalli við tann pening, sum teir hava lagt í felagið. Verður avlopið býtt øðrvísið, verður felagið ikki skattað sum felag, men felags-menninir sum einstaklingar. Skotið verður upp at strika hesa seinastu treytina viðvíkjandi býtinum av avlopinum.

4) § 21 varð brøytt í lóg nr. 49 frá 26. mai 1988. Av misgáum var reglan komin skeivt fyri, tí verður reglan rættað nú.

5) Ískoytið til § 28, stk. 4 er orsakað av, at umsitingin ynskir at týðiliggera meiningina í stk. 3.

6) Hetta er ein dagføring av lógini.

7) Skotið verður upp at broyta ferðafrádráttin í § 33 til ein frádrátt, sum bert er tengdur at fjarstøðuni í kilometrum millum bústað og arbeiðsstað. Frádrátturin skal vera ein ávís upphædd fyri kilometurin, sum fjarstøðan er millum bústað og arbeiðsstað, uttan mun til hvussu verður ferðast. Eisini verður skotið upp, at um ferðast verður eftir sjónum part av ferðaleiðini, verður bert veittur frádráttur fyri bíligasta ferðaseðil hjá persóni við ongum flutningstóli, tá uppskotið miðar ímóti ikki at taka støðu til, hvussu ferðast verður. Hetta fer at gera, at minni tíð fer til at kanna eftir, um frádráttirnir eru rættir. Tá slepst undan at kanna gamlar ferðaætlanir hjá strandferðsluni og bygdaleiðum og bera hesar saman við vaktarskipan, arbeiðstíð og koyritíð hjá skattaborgarum. Tað fer nógv tíð til at kanna hesi viðurskiftir, men sum ikki muna nógv í peningi. Eisini ger hetta, at stórur mismunur verður gjørdur á skattaborgarum, alt eftir hvussu tilvildarliga ferðast verður í mun til, hvussu ferðast kann verða á bíligasta hátt. Sum dømi kann verða nevnt, at persónur, sum koyrir millum Vestmanna og Tórshavn hvønn dag í egnum bili, tí hann kann ikki nýta almenna ferða- sambandið, fær ein ársfrádrátt uppá 13.968 kr., meðan tann persónurin, sum av tilvild kann nýta almenna ferðasambandið, men velur at brúka egnan bil, bert fær ein frádrátt uppá 2.640 kr.

Í samband við tvinnanda húsarhald verður skotið upp at avmarka frádráttin til bert at galda, um farið verður í aðra kommunu í Føroyum at arbeiða, og bert um tað er giftur persónur, sum ikki kann koma aftur og fram sama dag.

Skotið verður upp at seta frádráttin til 0,50 kr. fyri kilometurin og at frádrátturin fyri árið bert verður

loyvdur fyri upphæddir, sum eru størri enn 3.000 kr., t.e. svarandi til eina fjarstøðu uppá umleið 17 kilometrar millum bústað og arbeiðsstað.

Í hesum uppskoti verður vegalongd at skilja sum fjarstøðan millum bygdir í Føroyum sambært almenna uppmáting. Eisini verður skotið upp at veita frádrátt fyri hvørt arbeiðsviðurskifti sær, um persónur arbeiðir fyri fleiri enn ein arbeiðsgevara sama dag. Verður arbeitt fyri sama arbeiðsgevara á fleiri plássum sama dag, verður frádráttur loyvdur svarandi til fjarstøðuna til fyrsta pláss og frá seinasta plássi. Ferðing millum plássini verður viðgjørd eftir reglunum í § 29, nr. 7), nevniliga sum ferðing í ørindum fyri arbeiðsgevaran. Ferðing í samband við útbúgving, skúla og skeið verður í hesum sambandi ikki mett sum ferðing millum bústað og arbeiðsstað.

8) § 33, 1) fellur burtur, deils vegna broytingina í § 1 og deils vegna tess, at tá lestrarfrádrátturin kom inn í skattalógina, var hann ætlaður føroyingum. Í dag fáa føroyingar minst burturúr, meðan útlendingar fáa tann fyrimun, ið var ætlaður føroyingum.

9) Fylgibroyting frá broyting nr. 8.

10) - 21) Í skattalógini verður givin heimild fyri eini framskundaðari ársuppgerð soleiðis:

1) at uppgerðin verður gjørd 1. juni fyri løntakarar og teir roknskaparskyldugu persónar, ið hava latið sjálvuppgávu inn til ta tíð. Teir, sum eftir eru, fáa uppgerð so hvørt sum sjálvuppgávurnar koma inn,
2) seinasta freist til at senda sjálvuppgávu inn verður sett til 15. august, soleiðis at allir borgarar hava fingið ársuppgerð 10. september,
3) at avlopsskatturin verður goldin frá 1. juli og ikki frá 1. november sum nú,
4) at frestandi skattur fellur til gjaldingar 1. oktober, 1. november og 1. desember og ikki sum nú 1. januar, 1. februar og 1. mars árið eftir.

3) 12% gjaldið verður sett til 9%.

Málið við hesum uppskoti er at avgreiða skattaborgarnar so skjótt sum til ber.

22)-23) Síðan samtíðarskattalógin kom og serliga eftir at líkningarráðið hevur sett á stovn deildir fyri ávis økir, verður so gott sum øll álíkning gjørd av teimum kommunalu líkningarmyndugleikunum saman við deildum ráðsins. Hannagongdin er tí tann, at tann skattalistin, sum fyrr varð skrivaður av teimum kommunalum líkningarmyndugleikunum eftir sjálvuppgávunum, verður nú oftir at allar sjálvuppgávur eru lisnar inn á teldur, skrivaður og sendir kommunala líkniqarvaldinum. Her er tí bert talan um at dagføra lógina, so at hon samsvarar við mannagongdina nú.

24) Í § 105, stk. 1 í skattalógini er heimild til at líkningarráðið ásetur serligar innlatingarfreistir av sjálvuppgávu hjá persónligum skattgjaldarum, sum hava roknskaparskyldu og er henda heimild brúkt í serligari kunngerð. Í stk. 2 í somu grein er heimilað kommunala líkningarvaldinum/líkningarráðnum at leingja freistina sum eftir § 105, stk. 1 er sett av líkningarráðnum. Í dag er sostatt heimild til, at kommunala líkningarvaldið kann leingja ta av líkningarráðnum ásettu freistina í kunngerðini óavmarkað. Neyðugt er at lógarfesta eina fyri báðar partar bindandi seinastu innlatingarfreist.

Skulu bæði kommunala líkningarvaldið og líkningarráðið heva heimild at leingja freistina ásett í kunngerðini eftir § 105, stk. 2 til ávísa tíð, kann hetta gerast við at seta í lógina, at hvørgin av hesum kann leingja freistina út um 15. august.

Tað fæst ein felags seinasta freist fyri leinging av innlatingarfreist.

Finnbogi Ísaksen
landsstýrismaður

/Jálgrim Hilduberg

Álit

í

løgtingsmáli nr. 95/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tórbjørn Poulsen, Heini O. Heinesen, Olaf Olsen og Agnar Nielsen) er samdur um, at viðvíkjandi § 1, 7) eigur at verðua gjørð einfald frádráttarskipan, men tá hesin spurningur er sera umfatandi og fløktur, er neyðugt at arbeitt verður víðari við málinum í nevndini, og setir tí fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at skattanevndin viðvíkjandi § 1, 7) í fyriliggjandi uppskoti arbeiðir víðari við málinum sum millumtinganevnd, tá málið er ov umfatandi og fløkt til at verða avgreitt í hesi syftu, og at álit verður lagt fram í ólavsøkutingsetuni.

Annars mælir meirilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevnda undantaki.

Minniliutin (Atli P. Dam) førir fram viðvíkjandi uppskoti um broyting í reglunum um frádrátt fyri ferðir ímillum

bústað og arbeiði:

Galdandi reglur eru torførar at umsita, og verður broytingin mett einfaldgerð. Hin vegin skerst ikki burtur, at broytingin ber í sær miss fyri mong arbeiðsfólk, sum illa hava ráð til hesa dýrking í livikostnaðinum, og ójavni í viðgerð av skattaborgarum alt eftir tíð og stað verða ikki burturtikin.

Minnilutin heldur, at rímuligt var, at arbeiðsgevarin og ikki aðrir skattaborgarar rindaði ferðakostnaðin hjá arbeiðsfólki sínum, men miðar uppskotið als ikki móti hesum.

Tvørturímóti verður enn einaferð roynt at loysa eina skyldu, sum vinnulívið hevur yvir skattaskipanina. Slíkt ger hana bert fløktari enn neyðugt.

Minnilutin ásannar, at valla er væntandi, at samgongan fer at taka stig til at áleggja arbeiðsgevaranum slíka skyldu, og setir tí einki uppskot fram.

Í øðrum lagi tekur nevndi minniluti undir við uppskoti meirilutans.

SKATTANEVNDIN, 30. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080. Telex 81210 lingma fa. Telefax 14942. Pósthús 64
Viðgreiðslutíð: Kl. 10—15, leygardag stongt

21. mars 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

JK/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 96/1988: Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

§ 1.

Í § 9, stk. 2 í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum verður eftir 3. punktum skoytt uppí sum 4. punktum:

"Líkningarráð Føroya verður harumframt heimilað at nýta persónnummarið í samband við fyrisiting av løgtingslóg um frítíðarløn og løgtingslóg um barnastyrk.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlige myndigheders registre.

§ 1.

I § 9, stk. 2 i lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre indsættes efter 3. punktum som 4. punktum:

"Lagtingsrådet bemyndiges desuden til at anvende personnummeret i forbindelse med administration af lagtingslov om ferie med løn og lagtingslov om børnetilskud.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg um evnisskráir kann Líkningarráðið bert brúka P-talið í sambandi við skattamál. Tað hevur tó eisini verið brúkt at avgreiða barnastyrkin og frítíðarlønina, men Skrásetingareftirlitið hevur nú gjørt vart við, at hetta er ikki loyvt.

Skal P-talið ikki nýtast í teimum báðum nevndu førunum, verður neyðugt at skipa ein sjálvstøðugan stovn ella eina deild av Líkningarráðnum at taka sær av hesum. Hetta tekur tíð og krevur eykaútreiðslur. Barnastyrkurin fyri apríl ársfjórðing verður í hesum føri seinkaður heilt nógv.

Landsstýrið mælir tí til, at løgtingslógin um evnisskráir verður broytt, so at Líkningarráðið eisini kann brúka P-talið til barnastyrkin og frítíðarlønina.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

Jálgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 96/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir í. viðgerð 29. mars beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Minnilutin (Marita Petersen og Suni Jacobsen) mælir frá, at uppskotna broytingin í løgtingmáli um evnisskráir hjá almennum myndugleikum verður samtykt í verandi líki áðrenn skrásetingarspurningurin er kannaður úr í æsir.

Hinvegin mælir nevndi minniluti til, at ein nevnd við einum limi úr hvørju løgtingsflokki verður sett til at viðgera skrásetingarskipanina og spurningin um, hvat p-talið skal nýtast til í framtíðini og setur fram soljóðandi

u p p s k o t

til

s a m t y k t a r

Løgtingi samtykkir at nevnd verður sett við einum limi úr hvørjum løgtingsflokki til at viðgera skrásetingarskipanina og spurninginum hvat P-talið skal nýtast til í framtíðini og verður álit at leggja fram í ólavsøkutingsetini.

Umboð Tjóðveldisflokksins (Heini O. Heinesen og Magni Arge) førir fram, at tað var samgongan, sum sat frá 1981 til 1984, sum kom við lógini um evnisskráir (p-talið). Tá kundi tjóðveldisflokkurin ikki taka undir við eini slíkari skipan og mótmælti, at henda lóg varð sett í gildi fyri Føroyar. Lógin kom tí til at vera sera nógv avmarkað og kann í dag bert nýtast í samband við skatt. Tað, at teir flokkar, sum settu hesa lóg í gildi, nú ræðast sítt egna barn, er ikki annað enn "spæl fyri gallarínum".

Tjóðveldisflokkurin er ikki minni ivasamur í dag, tá talan er um at skráseta fólk inni á teldum, men tað er ein

aðalmunur at brúka p-talið í samband við okkara samtíðar-skattaskipan. Eftir at henda skipan hevur verið í gildi nøkur ár, og hevur vist í verki, at hon riggar væl, er ikki orsøk til at sáa iva um arbeiðið hjá líkningarráðnum á hesum øki.

Uppskot landsstýrisins gevur ongar nýggjar møguleikar fyri skráseting, tí henda skráseting er neyðug frammanundan í samband við skatting av frítíðarpeningi, so hvørt hesin verður fluttur frá arbeiðsgevarar til frítíðargrunnin.

Umboð Fólkaflokksins (Jógvan við Keldu) sær tær vansar sum kunnu verða í at víðka skrásetingarskipanina, og vísir til samgonguskjalið, har p-tals skipanin skal takast upp til viðgerðar. Landsstýrismaðurin Finnbogi Ísakson hevur á fundi givið vissu fyri, at málið viðvíkjandi skrásetingarskipanini verður viðgjørt sambart samgonguskjalinum, við tí fyri eyga at fáa greiðu á, hvat p-talið sambart skrásetingarlógina kann nýtast til soleiðis at annað tiltak ikki kann setast í verk fyrenn hetta arbeiðið er avgreitt.

Meirilutin (Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen og Magni Arge) heldur at tekur tingið hinvegin undir við uppskotinum, sum javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin hava sett fram seinkar hetta útgjaldingunum og førir samstundis til, at nýggur almennur stovnur skal byggjast upp til at taka sær av hesum.

Hetta eru púra óneyðugar útreiðslur, sum tá verða lagdar á skattaborgaran, og seinkingin verður nógvum borgarum til stóran ampa.

Út frá omanfyri standandi viðmerkingum mælir meirilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

RÆTTARNEVNDIN, 31. mars 1989.

Jógvan við Keldu Marita Petersen Suni Jacobsen

Magni Arge Heini O. Heinesen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-11 Tórshavn.

21. mars 1989

11. 11080 . Telex 81310 fingms sø . Telefax 14942 . Postkassi nr.
Vanligur skrivstovutími: kl. 10—15, leygardag stongt

F. L. nr.
[illegible]

HJ/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 97/1988: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýtt stk. 2 í § 1 verður sett:
"Skattlig avskriving eftir hesi løgtingslóg kann ikki verða gjørd av ognum, ið meira enn tveir persónar eiga í felag um verunliga leiðslan í felagnum hevur sæti í øðrum landi."

lagtingslov omændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) Som nyt stk. 2 i § 1 indsættes:
"Skattemæssige afskrivninger efter denne lagtingslov kan ikke foretages af aktiver, som i fællesskab ejes af flere end to personer, hvis den virkelige ledelse i fællesskabet har sit

Viðmerkingar:

1) - 4):

Løgfrøðiliga er ivasamt, um heimild er til at nokta persónum, ið eru skattskyldugir í Føroyum, og sum eru kommanditistar í útlendskum kommanditfeløgum, at draga frá hall og avskrivingar frá hesum feløgum, tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp. Viðvíkjandi luttøku í útlendskum partsreiðaríum og íognarfeløgum er eingin tvi um, at loyvt er at draga frá hall og avskrivingar.

Ofta er trupult at skilja ímillum frammanfyri nevndu feløg, og tá ið tílík luttøka einki gagnar føroyska samfelagnum, men bert hevur til endamáls at minka um skattin hjá luttakarunum, verður skotið upp at nokta avskriving í sambandi við luttøku í øllum tílíkum feløgum.

Men tó eigur líkningarráðið at fáa heimild at geva undantaksloyvi, um so er, at lógtingslógin forðar fyri skilagóðum atlanum.

5): Broytingin er einans gjørd fyri at fáa samsvar millum føroyska og danska tekstin.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

1

løgtingsmáli nr. 97/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt samráðing við umboð fyri líkningarráð Føroya.

Samd nevnd mælir til at samtykkja uppskotið.

SKATTANEVNDIN, 30. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TIf. 11080 . Telex 81310 tinges sp . Telefax 14942 . Postboks 64
Kvgreiðsluusk: Kl. 10—15. Ievgardag stongt

21. mars 1999

F. L. j. nr.
(at tilskila á svari)

HI/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 98/1988: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. desember 1971 um íløgugrunnar verður gjørd hesa broyting:

Í § 3, stk. 1 verður sett sum nýtt 2. punktum:

"Avsetingar til íløgugrunnar kunnu ikki verða nýttar til forskotsavskriving av útveganarútreiðslum av teimum í § 1, stk. 2 í løgtingslóg nr. 52 frá 29. desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m. nevndu ognum."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om investeringsfonds.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfonds foretages følgende ændring:

I § 3, stk. 1 tilføjes som nyt 2. punktum.

"Henlæggelser til investeringsfonds kan ikke anvendes til forlods afskrivning på anskaffelsesudgifter vedrørende dem i § 1, stk. 2 i lagtingslov nr. 52 af 29. december 1981 om skattemæssige afskrivninger m.v. nævnte aktiver."

§ 2.	§ 2.
Henda lögtingslög kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Broytingin er ein fylgjubroyting stavandi frá teimum broytingum, sum eru skotnar upp í § 1 í avskrivingarlógini.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

løgtingsmáli nr. 98/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir á álitið á løgtingsmálið nr. 97: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar, og mælir til at samtykkja uppskotið.

SKATTANEVNDIN, 30. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

21. mars 1989

F. L. j. nr.

Skrivstovutíðir kl. 10—15. Kvirkisvegur sunnan

JP/IM

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 99/1988: Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, pkt. 3.09 verður viðmerking 1 strikað.
2. Í § 1, pkt. 6 verður yvirskriftin orðað soleiðis:
   "6. GÓLV- OG VEGGJA-KLÆDNINGSTILFAR."
3. Í § 1 verður sum nýtt pkt. 6.02 sett:
   "Tapet, tapetbordar o.t.

4. § 1, pkt. 8.06 verður strikað.

5. § 1, pkt. 11.02 verður strikað.

6. Í § 1, pkt. 13 verður yvirskriftin orðað soleiðis:
"13. VØRUR ÚR LEIRI, STEINTOY, POSTALÍN OG MARMOR."

7. § 1, pkt. 16.03 verður orðað soleiðis:
"Skip og bátar undir 5 BRT. av virðinum 10%"

8. § 1, pkt. 17 verður orðað soleiðis:
"17.MANUFAKTUR, TÓGV OG TRÁÐUR.

17.01	Gólvteppir og gólvteppitoy	av virðinum 22%
17.02	Aðrar manufaktur-vørur, sum metur-vørur, vovnar ella trikotasja, voks-dúkar, klædna-piøgg, sokkar, hosur, handskar o.t. uttan mun til tilfarið	av virðinum 22%
17.03	Tógv og tráður, tó ikki fiskisnøri, togverk, seglgarn og tilfar hertil og suturtráður.	av virðinum 22%"

9. § 1, pkt. 18.01 verður orðað soleiðis:
"Fiskahermetikkur, eisini hummarar, krabbar

	og rækjur.		av virðinum 25%"
10.	§ 1, pkt. 18.05 verður orðað soleiðis: "Sukurláta, sukurlátavørur, kakao við innihaldi av sukri, lakressvørur, eins og matísur, sukurvørur so sum karamellir, marcipan, bomm o.t.:		
	A. Sukurláta í blokkum, plátum o.t. ella sum pasta ella pulvur, íroknað kakao við sukri, í pakningi við nettovekt yvir 2 kg	1 kg	5,00 kr.
	B. Aðrar vørur	1 kg + av virðinum 32%"	12,00 kr.
11.	§ 1, pkt. 18.06 og 18.07 verða strikað.		
12.	§ 1, pkt. 18.10-18.17 verða strikað.		
13.	Í § 1, pkt. 18.18, 18.19 og 18.20 verður "av virðinum 40%" broytt til		"av virðinum 20%"
14.	Í § 1, pkt. 19.01 verður aftaná orðið "skeiðir" sett: "Spennir, knappar, mallur o.t. til føroysk klæðir."		
15.	§ 1, pkt. 21 verður strikað.		
16.	Í § 1, pkt. 24 verða strikað orðini "handrøktaramboð, kambar" og teksturin "tó undantikið gjørdar tenn, glareyga-		

stengur, tannlæknaspegl og emblemir, brillugløs, ikki ísett, og kontaktlinsur úr glasi ella øðrum tilfari".

17. Í § 2, pkt. b verður skoytt uppí:
"Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur um, úr hvørjum londum og eftir hvørjum treytum akfør, bátar og flogfør kunnu verða innflutt sum flytigóðs."

18. § 2, pkt. g verður orðað soleiðis:
"Ortopædiskir lutir, protesur, tó undantikið tannprotesur, hoyritól og glaseygu v.m."

19. § 3, pkt. c verður orðað soleiðis:
"fyri lutir, ið koma higar til umvælan, vask, stutt brúk o.t. og verða fluttir útaftur. Fyri maskinur, tól og amboð, ið verða nýtt vinnuliga kann gjaldfrír innflutningur bert veitast sum tollendurgjald, ið er 8,33% fyri hvønn mánað, vørurnar hava verið í Føroyum styttri enn 12 mánaðir."

20. § 3, pkt. q verður orðað soleiðis:
"fyri motorakfør, camp-

ingvognar, flogfør og stuttleikabátar, tó persónar sum ikki eru fastbúgvandi her eiga, og sum teir sjálvir flyta inn higar fyri stutta tíð til egna nýtslu, meðan tey eru her og tá hesi før ikki verða brúkt til vinnuligan flutning innanoyggja. Sum fastbúgvandi er at skilja persónur, sum er skrásettur sum fastbúgvandi hjá landsfólkayvirlitinum."

21. § 3, pkt. 1 verður strikað.

22. Í § 3 verður sum nýtt pkt. 1 sett:
"Fyri ávísar vørur úr menningarlondum. Landsstýrið ásetur nærri reglur við kunngerð."

23. Í § 5 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"Gjaldskylduga virðið av vørum, ið hava verið uttanlands til umvælingar ella umbyggingar, er virðið av tilfari, ísettum lutum, arbeiðsløn og øðrum kostnaði í hesum sambandi, her íroknað cif-kostnaður til Føroyar."

24. Í § 5 verða stk. 3, 4 og 5 hereftir stk. 4, 5 og 6.

25. Sum nýggj § 5 a verður sett:
"Regluligt uttanlanda ferðamanna- ella farmasamband kann bert setast á stovn við loyvi frá tollvaldinum."

26. Í § 10 verða pkt. c og s strikað.

27. § 16 verður orðað soleiðis:
"Er gjaldið ikki greitt í seinasta lagi 2 mánaðir aftaná, at gjaldsfreistin er úti, kann gjaldsvaldið selja vørurnar fyri móttakarans ábyrgd við alment uppboð til rindan av gjaldi v.m., ella kann gjaldsvaldið fyri móttakarans ábyrgd, koyra vørurnar burtur undir tolleftirliti. Um tað eru vørur, ið eftir lóggávuni ikki mugu seljast í Føroyum, skal hann, ið hevur vørurnar í varðveistlu, sum skjótast aftaná, at 2 mánaða freistin er úti, útvega, at vørurnar verða fluttar úr aftur Føroyum ella burturbeindar undir tolleftirliti."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

F O R S L A G

til

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgift m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgift m.v. foretages følgende ændringer:

1. I § 1, pkt. 3.09 udgår bemærkning 1.
2. I § 1, pkt. 6 affattes overskriften således: "6. GULV- OG VÆG-BEKLÆDNING."
3. I § 1 indsættes som nyt pkt. 6.02:

"Tapet, tapetborder o.a. også tapetpapir	af værdien 22% "

4. § 1, pkt. 8.06 udgår.
5. § 1, pkt. 11.02 udgår.
6. § 1, pkt. 13 affattes overskriften således: "13. VARER AF LER, STENTØJ, PORCELÆN OG MARMOR."
7. § 1, pkt. 16.03 affattes således:

"Skibe og både under 5 BRT.	af værdien 10% "

8. § 1, pkt. 17 affattes således:

"17. MANUFAKTUR, GARN OG TRÅD.

17.01	Gulvtæpper og gulvtæppestof	af værdien 22%
17.02	Andre manufakturvarer, som metervarer, vævede eller trikotage, voksduge, beklædning, sokker, hoser, handsker o.a. lignet materiale	af værdien 22%
17.03	Garn og tråd, dog ikke fiskesnøre, tovværk, sejlgarn samt materiale dertil og suturtråd	af værdien 22%"

9. § 1, pkt. 18.01 affattes således:

"Fiskehermetik, også hummere, krabber og rejer af værdien 25%"

10. § 1, pkt. 18.05 affattes således:

"Chokolade, chokoladevarer, kakao som indeholder sukker, lakridsvarer samt konsumis, sukkervarer såsom karameller, marcipan, bolsjer o.lign.

A. Chokolade i blokke, plader o. lign. eller som pasta eller pulver, medregnet kakao som

	indeholder sukker, i pakninger med nettovægt over 2 kg	1 kg	5,00 kr.
	B. Andre varer	1 kg + af værdien 32%"	12,00 kr.
11.	§ 1, pkt. 18.06 og 18.07 udgår.		
12.	§ 1, pkt. 18.10-18.17 udgår.		
13.	I § 1, pkt. 18.18, 18.19 og 18.20 ændres "af værdien 40%" til	"af værdien 20%"	
14.	I § 1, pkt. 19.01 indsættes efter ordet "skeer": "Spænder, knapper, maller o.lign. til færøsk national-dragt."		
15.	§ 1, pkt. 21 udgår.		
16.	I § 1, pkt. 24 udgår ordene "manicuregenstande, kamme" og teksten "dog undtaget kunstige tænder, brillestænger, tandlægespejl og emblemer, brilleglas, ikke isat, og kontaktlinser af glas eller andet materiale."		
17.	I § 2, pkt. b tilføjes: "Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for, fra hvilke		

lande og efter hvilke betingelser motorkøretøjer, både og luftfartøjer kan indføres som flyttegods."

18. § 2, pkt. g affattes således:
"Ortopædiske genstande, proteser, dog undtaget tandproteser, høreapparater og briller m.v."

19. § 3, pkt. c affattes således:
"af varer, der kommer hertil til reparation, vask, midlertidig anvendelse o.lign. og genudføres. For maskiner, apparater og redskaber, som bliver brugt erhvervsmæssigt kan afgiftsfri indførsel kun tillades som toldrefusion, der er 8,33% for hver måned, varerne har været på Færøerne mindre end 12 måneder."

20. § 3, pkt. g affattes således:
"for motorkøretøjer, campingvogne, luftfartøjer og fritidsbåde, som personer, der ikke er fastboende her, ejer, og som de selv indfører hertil midler-

tidigt til eget brug, mens de er her og når de ikke bliver brugt til erhvervsmæssig transport indenlands. Som fastboende regnes personer, som er registreret som fastboende hos folkeregisteret."

21. § 3, pkt. 1 udgår.

22. I § 3 som nyt pkt. 1 indsættes:
"for visse varer fra udviklingslande. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere regler."

23. I § 5 indsættes som nyt stk. 3:
"Den afgiftspligtige værdi af varer, som har været udenlands til reparation eller ombygning, er værdien af materiale, isatte dele, arbejdsløn og andre omkostninger i denne forbindelse inclusive cif omkostninger til Færøerne."

24. § 5, stk. 3, 4 og 5 ændres til stk. 4, 5 og 6.

25. Som ny § 5 a indsættes:
"Regelmæssig udenlands passager- og fragtforbindelse kan kun opret-

tes med toldmyndig-
hedernes tilladelse."

26. § 10, pkt. 2 og 3 udgår.

27. § 16 affattes således:

"Er afgiften ikke betalt senest 2 måneder efter, at betalingsfristen er udløbet, kan den opkrævende myndighed sælge varerne for modtagerens risiko ved offentlig auktion til dækning af afgiften m.v., eller kan den opkrævende myndighed for modtagerens risiko destruere varerne under toldkontrol. Drejer det sig om varer, der efter lovgivningen ikke må sælges på Færøerne, skal den, der opbevarer varerne, snarest muligt efter udløbet af 2 måneders fristen foranledige varerne genudført fra Færøerne eller destrueret under toldkontrol."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar.

Í hesum lógaruppskoti um broytingar í lóg nr. 23 frá 11. februar 1950 er í § 1 fyrst og fremst talan um at gera broytingar, ið rudda upp ymiskt, ið ikki hevur serstórvegis týdning fyri tollinntøkurnar, men kemur at geva ein umsitingarligan lætta. Undantikið frá hesum er tó uppskotið um at taka av gjaldið á el-inleggingarlutum (Ipnr. 11.02), ið umframt serligt og eyka innflutningsgjald uppá tilsamans 28% her hevur eitt gjald uppá 30%, ella tilsamans 58%. Broytingin gevur ein inntøkumiss uppá 3-4 mill. kr.

Av týðandi broytingum annars verður vist til broytingaruppskotið í § 3, pkt. c, sum hevur við sær, at arbeiðsmaskinur og tílík tól, sum t.d. byggifeløg flyta inn til fyribils nýtslu, skulu gjalda fullan toll, men fáa toll endurgoldnan, um maskinurnar verða endurútfluttar, í mun til tíðina, maskinurnar hava verið í Føroyum styttri enn 12 mánaðir.

Eisini verður vist til broytingaruppskotið í § 5, sum ásetur, at umvælingar og umbyggingar uttanlanda skulu tollast av virðisøkingini, t.v.s. bæði av teim lutum, ið eru nýttir í hesum arbeiði og av arbeiðsløn og øðrum kostnaði, herí c.i.f. kostnaður aftur til Føroyar. Henda regla verður nýtt víða og í hvussu so er í øllum GATT-londum. Hesar seinast nevndu broytingar kunnu væntast at økja nakað um tollinntøkurnar, men torført er at meta um hvussu nógv, men ivaleyst í minsta lagi eins nógv og tollmissurin í sambandi við avtøku av gjaldi á el-innleggingarlutum.

Vist verður annars til viðmerkingar til einstøku punktini.

ad 1. Likørar:

Eftir viðmerkingini skuldi likørur altíð tollast undir 3.09, tvs. eftir styrki yvir 50 rúmrposent. Broytingin merkir, at likørur verður tollaður eftir veruligu styrkini.

að 2. Gólv- og veggaklæðningstilfar verður lagt í ein bólk, m.a. tí nógv av tilfarinum líkist, og at tapet fæst úr øðrum tilfari enn pappíri (lpnr. 21).

að 3. Er ein fylgja av broytingini undir 2, t.v.s. at tapet er flutt til 6.02.

að 4. Paraboluntennur:

Lpnr. 8.06 varð sett inn í lógina í 1986. Reglan hevur verið torfør at umsitið og hevur at kalla ongar inntøkur givið.

að 5. El-innleggingartilfar:

Víst verður til, at tað tilfar, ið verður tollað undir lpnr. 11.02, er tilfar, ið fyrst og fremst verður nýtt í sambandi við nýbygging og størri umvælingar. El-innleggingartilfarið er í løtuni at kalla tað einasta byggitilfar, ið ikki kemur undir bert 28% eilla lægri gjald (fyri timbur, sement o.s.fr. verður bert goldið 6%).

að 6. Marmor:

Broytingin er uppískoyti viðvíkjandi marmor, sum náttúrliga hoyrir undir henda bólkin. Hetta merkir eina hækking fyri vørur úr marmor.

að 7. Serútgjørdir alibátar:

Tá lógarbroyting viðvikjandi bátum varð gjørd í 1986, vórðu serútgjørdir alibátar undantiknir serliga innflutningsgjaldinum og gjaldinum eftir lpnr. 16.03 (10%). Hett verður, at føroyskir bátaframleiðarar kunnu nøkta tørvin á alibátum undir 5 BRT., sum eru í løtuni undantiknir her. Sb. lóg um serligt innflutningsgjald. Tollurin verður nú 28% - 10%.

að 8. Manufakturvørur:

Roynt verður at gera tekstin greiðari samstundis sum viðmerking um, at plast altíð skal roknast sum manufaktur, er strikað. Henda regla er sera óheppin, tí nógv plast verður nýtt til endamál, ið einki hava við klædnavørur at gera, t.d. til innbalding av fiskavørum o.ø. Klædnavørur úr plasti ella øðrum tilfari enn spunatilfari verða framvegis tollaðar her.

að 9. Fiskahermetikkur:

Bert broyting í teksti, ikki í innihaldi.

að 10. Sukurlátuvørur v.m.:

Broytingin undir lpnr. 19.05, ið býtir upp millum vørur í stórpakningi og vørur í smásølupakningi, er skotin upp fyri at letta um umsitingin av teimum vørum, ið fara til víðari framleiðslu og tað, ið verður seit yvir disk. Samanber uppskot um broyting í framleiðslugjaldinum.

að 11. Sukur, te, kaffi, turkað frukt og mandlur:

og 12. Her verða strikað tollgjøld, ið tey flestu eru sett í kr. pr. kg (sukur, te, kaffi o.s.fr.), ið lítið og einki geva í tollinntoku, men geva munandi krupullaikar í umsitingini. T.d. gevur 0,15 kr. pr. kg sukur bert 150.000 kr. (Lpnr. 18.08 og 18.09 Tilfar til matis verður standandi eftir).

að 13. Djórafóði:

Broytingin í tollinum fyri henda bólk er orsakað av broytingaruppskoti til lóg um serligt innflutningsgjald, soleiðis at hesar vørur ikki verða fritiknar serliga innflutningsgjaldinum.

að 14. Føroysk klæðir:

Nevndu lutir til føroysk klæðir, verða ikki roknaðir sum skreyt, men sum lutir úr ædalmetalli v.m. Tí er neyðugt at undantaka hesar vørur í lpnr. 19.01, um tær skulu fáa sonu sømdir sum skreyt úr ædalmetalli v.m. undir lpnr. 24.01.

að 15. Spælikort:

Verður strikað sum fylgja av broytingini nevnd undir pkt. 2. Spælikort verða samstundis at tolla sum leikutoy og felagsspøl undir lpnr. 12, har tollurin er 20% í staðin fyri, at tollurin her er 4 kr. spælið.

að 16. Hondrøktaramboð og kambar:

Hildið verður rímiligt, at handrøktaramboð og kambar ikki verða tollað sum skreyt. Sb. at fótrøktaramboð ikki eru í hesum bólki. Restin av tekstinum, ið skotið

verður upp at strika, er komin inn har av misgáum undir nevndarviðgerðini við seinastu tolllógarbroyting.

ad 17. Akfør, bátar og flogfør sum flytigóðs:

Reglurnar um vanligt flytigóðs er ikki neyðugt at broyta í innihaldinum, men kanska kann okkurt skrivast nágreiniligari í kunngerð. Hinvegin verður hildið, at akfør, bátar og flogfør ikki kunnu viðgerast sum vanligt flytigóðs, tá hesar vørur vanliga eru sera kostnaðarmiklar. Hetta hevur ofta fört við sær, at slíkar vørur, serliga motorakfør, hava verið keyptar í hóskandi tíð undan flyting til Føroyar. Tá slík flyting er farin fram úr londum, har lítið og einki avgjald er á motorakførum, t.d. Grønlandi og USA, hevur verið talan um stóran vinning í mun til akfar, keypt eftir føroyskum avgjaldsreglum. Sama kann eisini hugsast um stuttleikafør, sum í Føroyum verða tollað við 23+30= 58%.

Reglurnar um akfør skulu síggjast í samanhangi við broytingaruppskot í lóg um skrásetingargjald, har regla um akfør sum flytigóðs eisini er at finna og uppskot er um broyting.

ad 18. Tannprotesur:

Tað verður ikki hildið rímiligt, at tannprotesur skulu vera tollfriar, tá hesar nú verða framleiddar í Føroyum.

ad 19. Maskinur, tól og amboð:

Víst verður til tað, ið er sagt frammanfyri um hesa broyting. Leggjast kann afturat, at ein tilsvarandi regla er at finna í norsku tolllógini.

ad 20. Motorakfør, campingvognar, flogfør og stuttleikabátar hjá persónum, ið ikki eru fastbúgvandi í Føroyum:

Tær reglur, ið verða nýttar í dag eftir núverandi § 3, pkt. g, eru ikki serliga væleydnaðar, tí privatir bilar fáa loyvi at verða her í landinum upp til 6 mánaðir. Støðan er harafturat tann, at nógvir av hesum bilum als ikki eru "privatir", men eru bilar, ið fyritøkur, ið

hava eitthvørt arbeiði í Føroyum, lata fólk sitt hava til nýtslu, meðan tey eru stødd her. Her er eisini talan um vinnubilar (vørubilar, smærri lastbilar o.s.fr.), sum í veruleikanum eru í vinnu her í landinum, sjálvt um tað ikki er "móti gjaldi til flutning millum pláss innanoyggja". Hugsanin við tekstinum, ið er skotin upp, er at gera reglugerð ella kunngerð, sum nærri útgreinar undir hvørjum treytum akfør v.m. kunnu verða í landinum "stutta tíð". Hugsað verður um, at høvuðsætlanin er at tryggja, at ferðafólk kunnu koma við sínum akfari ella stuttleikafari og fara avstað aftur, tá fritíðin er hildin.
Eisini verður hildið rímiligt, at t.d. sølumenn við sínum vørusýndum kunnu koma í styttri tíð, sama er galdandi fyri servicefólki til ymiskar maskinur og tól, har tað er neyðugt at hava bil við til tey tól, ið skulu nýtast. Slíkar vitjanir eru vanliga stuttar, ætlandi vanliga í mesta lagi einar 4-6 vikur. Tvs. at ein tíðarfreist uppá 3 mánaðir ella kanska minni eigur at verða sett.

ad 21. Bjargingarbelti og -vestar. Nevðransónir og onnur lógarkrevd útgerð til bátar:
Reglan í § 3, pkt. 1 kom inn her av misgáum við seinastu lógarbroyting.

ad 22. Vørur frá menningarlondunum:
Flestu lond veita menningarlondum tollsømdir fyri ávísar vøru. Landsstýrinum verður heimilað at seta reglur og lista yvir vørur og lond.

ad 23. Umvælingar og umbyggingar uttanfyri Føroyar:
Sum longu nevnt í innganginum, verður skotið upp at tolla umvælingar og umbyggingar uttanlands eftir teimum reglum, ið verða nýttar í GATT-londunum. T.v.s. at tollur skal gjaldast av cif-virðinum av teirri virðisøking, ið kemur fram av umvælingini ella umbyggingini. Higartil hava bert lutirnir til hesi arbeiði verið tollaðir, m.a. við heimild í § 3, pkt. c. Skotið er upp framman fyri eisini at broyta hesa reglu.

að 24. Er ein fylgja av broytingini undir pkt. 23.

að 25. Treytin, um at stovnsetan av uttanlanda ferðamanna- og farmasambandi skal verða við loyvi frá tollvaldinum, verður sett fyri at ansa eftir, at tey viðurskifti, ið eiga at vera í lagi í hesum sambandi kunnu tryggjast, t.d. goymslurúm til óinnloyst tollgóðs, sigling til havnir, ið eru tolleftirlitshavnir, umstøður at tollkanna ferðafólk o.s.fr.

að 26. Parabolantennur og sukurvørur:
Henda broyting í framleiðslugjaldinum hongur saman við broytingunum undir lpnr. 8.06 og 18.05.

að 27. Broytingin miðar ímóti at fáa fastari reglur viðvíkjandi tollskyldugum vørum, ið ikki verða innloystar. T.d. er í núgaldandi reglu ikki loyvt at beina fyri øli og rúsdrekka undir tolleftirliti, men tað skal av landinum.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jálgrim Hilduberg

Á l i t

í

<u>løgtingsmáli nr. 99/1988 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at skreytvørur v.m. úr aðalmetali og eisini tílíkar vørur, ið eru gyltar, silvaðar ella plettaðar við aðalmetali eiga at verða tollaðar við 30% av virðinum mótvegis einki gjald, og inniber hetta, at § 1, 14) í uppskoti landsstýrisins fellur burtur. Somuleiðis mælir nevndin til, at § 1, 10) viðvíkjandi § 1, pkt. 18.05 fær aðra orðing við ávísari viðmerking.

Viðvíkjandi § 1, 7), har uppskot landsstýrisins viðvíkjandi § 1, pkt. 16.03 verður orðað: "Skip og bátar undir 5 tons" er nevndin samd um at mæla landsstýrinum til at skipa fyri, at nýttar verða reglur viðvíkjandi uppmáting, sum geva eitt meiri veruligt úrslit enn tað, sum í løtuni verður nýtt, tá her gongur sjón fyri søgn, at tonsatølini eru ógvuliga ymisk, hóast munurin í støddunum er lítil. Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar í 2. broti setir ein samd skattanevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Pkt. 10) verður orðað soleiðis-
"§ 1, pkt. 18.05 verður orðað
soleiðis: "Sukurláta, sukurvør-
ur, kakaao við innihaldi av

sukri, lakressvørur, eins og matisur, sukurvørur so sum karamellur, marcipan, nougat, bomm o.t.:		
A. Sukurláta í blokkum, plátum o.t. ella sum pasta ella pulvur, íroknað kakao við sukri, marcipani og nougat, í pakníngi við nettovekt yvir 2 kg	1 kg	5,00 kr.
Viðmerking: Vørur undir lpnr. 18.05 A. kunnu bert tollgreiðast av framleiðsluvirkjum, ið eru skrásett sum framleiðsluvirkir hjá tollvaldinum ímóti váttan fyri hvørja avgreiðslu, at vøran bert verður nýtt til framleiðslu.		
B. Aðrar vørur	1 kg + av virðinum	12,00 kr. 32%."

Pkt. 10) formuleres således:

§ 1, pkt. 18.05 affattes således:

"Chocolade, chocoladevarer, kakao med indhold af sukker, lakridsvarer samt konsumis, sukkervarer såsom karameller, marcipan, nougat, bon-boms o. lign.		
A. Chocolade i blokke, plader o.lign. eller som pasta eller pulver, medregnet kakao med indhold af sukker, marcipan og nougat, i pakninger med nettovægt over 2 kg	1 kg	5,00 kr.
Anmærkning:		

	Varer under lbnr. 18.05 A. kan kun fortoldes af fremstillingsvirksomh eder, der er registreret som fremstillingsvirksomh ed hos toldvæsenet og mod erklæring ved hver fortoldning om, at varerne udelukkende anvendes til fabrikation.		
B.	Andre varer	1 kg	12,00 kr.
		+ af værdien	32%

2) § 1, 14) fellur burtur.
§ 1, 14) bortfalder.

3) § 1, 16) (§ 1, pkt. 24) verður soljóðandi:
"24.01. Skreytvørur v.m. úr aðalmetali og eisini tilíkar vørur, ið er gyltar, silvaðar ella plettaðar við aðalmetali: 30%."
§ 1, 16) (§ 1, pkt. 24) formuleres således:
"24.01. Prydgenstande m.m. af ædelmetal samt de varer, der er forgyldte, forsølvede eller pletterede med ædelmetal: 30%."

SKATTANEVNDIN, 31. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til 3. viðgerð av løgtingsmálið nr. 99 (vetrarting): Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1. 23) verður soljóðandi:

"Gjaldskylduga virðið av vørum, ið hava verið uttanlands til umvælingar ella umbyggingar, er virðið av tilfari, ísettum lutum, arbeiðsløn og øðrum kostnaði í hesum sambandi, her íroknað cif kostnaður til Føroyar.
Vøra, ið hevur verið utanlands til umvælingar, verður at tolla sambart áðurgaldandi tollreglum (uttan arbeiðsløn) um so er at skjalprógvast kann, at vøran er farin av landinum áðrenn 21. mars 1989 og komin aftur til tollgreiðslu í Føroyum áðrenn 1. juni 1989".

§ 1. 23) formuleres således:

"Den afgiftspligtige værdi af varer, som har været udenlands til reparation eller ombygning, er værdien af materiale, isatte dele, arbejdsløn og andre omkostninger i denne forbindelse inclusive cif omkostninger til Færøerne.
Varer, som har været udenlands til reparation, fortoldes efter tidligere gældende toldregler (eksklusive arbejdsløn) såfremt det kan dokumenteres at varen er afsendt herfra før 21. mars 1989 og er blevet returneret til toldklarering på Færøerne inden 1. juni 1989".

SKATTANEVNDIN 31. mars 1989

Törbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

TF. 11080. Telex 81310 finmin fa. Telefax 14941. Postboks 64
Viðmøtetíðir: kl. 10—15, laugardag stongt

21. mars 1989

F. L. j. nr.
vísist altíð í svarið

JP/IM

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 101/1988: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald av motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 1 verða orðini "ið innflutt verða, og" strikað.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 102 fra 1. oktober 1986 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1. I § 1, stk. 1 udgår ordet "importerede".

2. § 16, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at seta nærri reglur um, úr hvørjum londum og eftir hvørjum treytum motorakfør v.m. kunnu skrásetast, tá tey eru innflutt sum flytigóðs."

2. § 16, stk. 1 affattes således:

"Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler om fra hvilke lande og efter hvilke betingelser motorkøretøjer m.v. kan registreres, når de er indført som flyttegods."

Viðmerkingar.

Broytingaruppskotið til hesa lóg, serliga § 16, hongur saman við broytingini um flytigóðs í tolllógini.

Eisini her mugu setast reglur, soleiðis at tað ikki her til at flyta inn akfør sum flytigóðs, uttan at gjalda skrásetingargjald, frá londum, har avgjøldini á bilum eru munandi lægri enn í Føroyum, og soleiðis hava møguleika fyri stórum vinningi. Hugsað verður um t.d. Grønland og USA.

Men núgaldandi reglan, ið verður praktiserað, gevur eisini flytandi úr t.d. skandinavisku londunum (burtursæð frá Danmark) munandi størri fyrimun, enn føroyingar, ið flyta til hesi lond, fáa. Millum Danmark og Føroyar eru treytirnar eftir avtalu eins fyri flytarar báðar vegir.

Tær reglur, ið landsstýrið setir, eiga at taka hædd fyri hesum viðurskiftum.

Í § 1, stk. 1 verður skotið upp, at orðini "ið innflutt verða, og" verða strikað. Hetta verður gjørt fyri at akfar (t.d. ein viðfestivognur), ið verður bygdur í Føroyum, eisini kemur undir skrásetingargjald.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/
/ Jálgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 101/1988 (vetrarting): Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Lógaruppskotið hevur onga grein um gildisáseting, og er nevndin samd um at seta broytingaruppskot fram hesum viðvíkjandi við tilskilan av, at lógin fær gildi 6 mánaðar frá uppskotsframløgudegnum. Eftir § 1, stk. 2, verður orðingin í § 16, stk. 1, broytt soleiðis, at landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at seta nærri reglur um, í hvørjum londum og eftir hvørjum treytum motorakfør v.m. kunnu skrásetast, tá tey eru innflutt sum flytigóðs. Í nevndu kunngerð verður ti gildisásetingin at tilskila sum omanfyri ásett. Sostatt setir eitt samd skattanevnd fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Sum § 3 verður sett:	Som § 3 indsættes:
"Hesa lóg fær gildi 21. september 1989."	"Denne lov træder i kraft 21. september 1989."

SKATTANEVNDIN, 31. mars 1989.

Törbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11080 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Vanligur skrivstovutíð: Kl. 10—15, leygardagar stongt

21. mars 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

JP/IM

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 102/1988: Løgtingslóg um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni o.ø. lidnum leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.

Uppskot

til

løgtingslóg um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni o.ø. lidnum leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.	lagtingslov om forbud mod indførsel og salg af øl, mineralvand o.a. færdige læskedrikke i dåser eller engangsflasker.
§ 1. Loyvt er ikki at flyta inn ella selja øl, mineralvatn ella aðrar leskidrykkir í dósum og eingangsfløskum.	§ 1. Det er ikke tilladt at indføre eller sælge øl, mineralvand eller andre læskedrikke i dåser eller engangsflasker.
§ 2. Brot á hesa lóg verða sektað við bót og hald verður lagt á ólógliga innfluttu ella seldu vøruna í nevndu ílátum.	§ 2. Overtrædelse af denne lov straffes med bøde og de ulovligt indførte eller solgte varer i de nævnte beholdere konfiskeres.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi lógtingslóg nr. 45 frá 24. mai 1974 um innflutning og søiu av øli og mineralvatni í einbrúksfløekum.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 45 fra 24. maj 1974 om indførsel og salg af øl og mineralvand i engangsbeholdere.

Viðmerkingar:

Grundin fyri ynskjum um hesa broyting er, at seinastu árini er stór nøgd av juice, kakao og øðrum drykkjum í dósum innflutt til Føroya. Lógin er ein umhvørvislóg ímóti emballaguni og eigur lógin tí eisini at fevna um leskidrykkir í somu ílátunum, sum øl og mineralvatn eru í.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/ Jalgrim Pilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 102/1988 (vetrarting): Løgtingslóg um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni o.ø. lidnum leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir til at samtykkja uppskotið.

SKATTANEVNDIN, 31. mars 1989.

Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinasen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

Á L I T
í

Løgtingsmál nr. 103/1988 (vetrarting): Vegir og lendingar

Samferðslunevndin hevur viðgjørt tær o.u. 270 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

A.

I: Vegir

Á fíggjarlógtingsíógini eru settar av undir gr. 13.1 116.5 mió. kr., til vegagerðir, umsiting av landsvegunum o.a..

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

U P P S K O T
til samtyktar

Til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra -	
harumframt til bryr, ferjulegur o.a.	96.260.890 kr.
Bundið í ikki nyttum játtanum o.u.	15.304.110 kr.
Til niðanfyri nevndu arbeiði	4.935.000 kr.
	116.500.000 kr.

Kommuna	til	Stuðningur 3/4 av kr.
Fugløyar	- dyrkingarveg uppi í Króki, Hattarvík	75.000
	- dyrkingarveg norður í Vatnsdal	75.000
Svíney	- liðugtgerð av vegnum frá bygdini út til bátahylin	150.000
Viðareiðis	- umvæling av Dalavegnum	150.000
Hvannasunds	- vegagerð í sambandi við alivinnu s.f. bygdina	200.000
	- vegagerð á Fossanesi	75.000
Klaksvíkar	- Torvadalsvegin	100.000
	- vegin til Gravardal	100.000
Kunoyar	- veg norður í Hús í Kunoy	75.000
	- veg norður frá bygdini í Haraldsundi	75.000
	At flyta	1.075.000

Viðvikjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljódandi

U P P S K O T

til samtyktar

Kommuna	til	Studningur (Har einki er tilskilað, er studningurin 75 % av upphædd)
Viðareiðis	- planering í Eiðsvík	
	3/4 av 50.000 kr/ár/2 ár	50.000
Kunoyar	- grótkast undir kirkjugarðinum í Kunoy	
	3/4 av 75.000 kr/ár/3 ár	75.000
Húsa	- ídnaðarøki í Knúksdali og lending á Blankskala	
	3/4 av 100.000 kr/ár/3 ár	100.000
Gøtu	- hampan um útsiðina av grótkastinum framvið "Hørenga"	
	3/4 av 100.000 kr/ár/3 ár	100.000
Runuvíkar	- bátahylin á Glyvrum	
	3/4 av 100.000 kr/ár/6 ár	100.000
	- Gomlustød í Lamba	
	3/4 av 100.000 kr/ár/4 ár	100.000
Nes	- brimskaða á verjugarðin í Oyrunum	
	3/4 av 200.000 kr/ár/6 ár	200.000
Skála	- framhaldsbygging av bátahavn í Skálafirði og bátahyl á Skála	
	3/4 av 300.000 kr/ár/6 ár	300.000
Sjóar	- veg og lending Innan Glyvur í sambandi við aling	
	3/4 av 100.000 kr/ár/3 ár	100.000
Sunda	- brimskaða á Oyri	
	3/4 av 200.000 kr/ár/3 ár	200.000
	At flyta	1.325.000

	Flutt	1.325.000
Gjáar	- lendingina í Gjónni	
	3/4 av 100.000 kr/ár/2 ár	100.000
Kollafjarðar	- bátahylin við Sjógv, atløgusiðu v.f.	
	3/4 av 100.000 kr/ár/6 ár	100.000
Kvivíkar	- brimskaða í Kvivík	
	3/4 av 200.000 kr/ár/2 ár	200.000
Argja	- hækking og styrking av brimgarðinum á Argjum	
	3/4 av 200.000 kr/ár/6 ár	200.000
Hests	- útbygging av nýggja havnarlagnum	
	95 % av 500.000 kr/ár/6 ár	95 % av 500.000
Nólsoyar	- økið rundan um flakavirkið og til avskipingartrampu	
	3/4 av 200.000 kr/ár/3 ár	200.000
Sørvágs	- bátahylin	
	3/4 av 100.000 kr/ár/4 ár	100.000
Sands	- iðnaðarøki úti í Stød	
	3/4 av 100.000 kr/ár/3 ár	100.000
Skopunar	- planering av øki við flakavirkið	
	3/4 av 400.000 kr/ár/3 ár	400.000
Skálavíkar	- bátaspæl	100.000
Húsavíkar	- lendingina í Dali, eykajáttan	
	3/4 av 200.000 kr/ár/2 ár	200.000
	- bátahylin í Húsavík	
	3/4 av 400.000 kr/ár/5 ár	400.000
Skúvoyar	- bátahylin	
	95 % av 800.000 kr/ár/4 ár	95 % av 800.000
	At flyta	4.725.000

	Flutt	4.725.000
Hvalbiar	- bátaspælið í Nesi	100.000
Famjins	- nýgerð og áboturar á lending	
	3/4 av 100.000 kr/ár/3 ár	100.000
Hovs	- brimskaða á bátabryggjuna (til alarar)	
	3/4 av 100.000 kr/ár/2 ár	100.000
Sumbiar	- bátahylin í Lopra	
	3/4 av 100.000 kr/ár/4 ár	100.000
	- bakkaverju í Sumba	
	3/4 av 100.000 kr/ár/6 ár	100.000
	Tilsamans	5.225.000

75 % av kr. 3.925.000 = kr. 2.943.750

95 % av kr. 1.300.000 = kr. 1.235.000

Tilsamans	kr. 4.178.750

	Flutt	1.075.000
Mikladals	- framhald av dyrkingarvegnum Glaðingar stein - niðan á Háls	150.000
Húsa	- veg til Knuksdal	100.000
Elduvíkar	- útstykkingarveg í Funningsfirði	100.000
Oyndarfjarðar	- útstykkingarveg norður í Bø	100.000
Fuglafjarðar	- vegagerð í Rossagerði	100.000
Gotu	- íbindingarveg í landsvegin undir Gøtueiði	100.000
Runavíkar	- vegin út á Glyvradal	75.000
	- umbygging av bygdarvegi í Rituvík	100.000
Nes	- vegin á Brekkuklætti	100.000
	- vegin til ítróttarokið á Svangaskarði	400.000
Sjóar	- útstykkingarveg Innan Glyvur	100.000
	- veg niðan í ovara Follend	75.000
	- nýggja íbinding til Selvindsvegin	75.000
Sunda	- veg til íbúðarøki á Oyri	75.000
	- veg til íbúðarøki á Oyrabakka	75.000
	- veg norður um Stóra, Oyri	75.000
Eiðis	- veg oman í Sveitaskálan	150.000
Gjáar	- brúgv um Hulduheyggj	100.000
Funnings	- bygdavegin	100.000
Haldórsvíkar	- veg niðan fyri bygdina í Tjørnuvík	100.000
Hvalvíkar	- útstykking í Hvalvík og Streymnesi	50.000
	- veg í Nesvík - oman til leguhúsið og alistøðina Foroya Laks	100.000
Hósvíkar	- kloakkir	100.000
	At flyta	3.575.000

	Flutt	3.575.000
Kollafjarðar	- útstykkingarveg á Signabø	100.000
Kvívíkar	- útstykkingarveg vestan fyri Kvívík	75.000
	- kloakk í Leynum	100.000
Vestmanna	- ovara veg, Gerðisheyggur - Fjørðurin	100.000
Tórshavnar	- dyrkingarveg í Kaldbak	100.000
Argja	- dyrkingarveg í Syðradali	100.000
Kirkjubøar	- dyrkingarveg út á Bø	100.000
	- útstykkingarveg undir Borgarhálsi	75.000
Hests	- ábøtur á bygdarvegin	150.000
Nólsoyar	- nýgerð av vegum og ábøtur á bygdavegin	150.000
Miðvágs	- veg til iðnaðarøki úti á Dal og brúgv um Hóssá	100.000
Sørvágs	- vegin igjegnum Útriðingsbøin og út á Bakka	100.000
Mykines	- vegagerðir í bygdini	100.000
Sands	- Sølruvíkarvegin	100.000
	- vegir ey. f. og n. f. Sandsvatn	75.000
	- vegin til Skálsafjørðingin	75.000
Skopunar	- brúgv um Stóra	200.000
Skálavíkar	- veg niðan á Kirkjugarðsgrind	75.000
	- veg norður í Heimastahaga	75.000
Skúvoyar	- rørportur	30.000
	- veg norður á Leiti	100.000
Hvalbiar	- veg vestur móti røðini í Sandvík	100.000
	- breiðking og lutvíst nýgerð av vegi frá Krógv og vestur til Hvalbiar skúla	100.000
	At flyta	5.855.000

	Flutt	5.855.000
Tvoroyar	- vegagerð i Heiðunum	150.000
	- vegin niðan til golmu Hvalbiargotuna	75.000
Hovs	- dyrkingarvegir	75.000
Vágs	- bussstoðgiplóss, gongubreyt og parkeringsplóss við gamla posthúsið og skúlan i Vági	100.000
	- niðaru brúgv um Gjógvará	75.000
Sumba	- veg i Víkarbyrgi	150.000
	Tilsamans	6.580.000
	=	4.935.000

II

Lendingar

Játtanir fyri fíggjarárið 1989, sum samtyktar eru áður, eru hesar :
(Har einki er tilskilað, er studningurin 75 % av teim nevndu upphæddunum).

Kommuna	Til		Upphædd
Svínoyar	Bátahyl í Glógvansurð		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	85 % av	600.000
	Bátahyl í Glógvansurð		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	85 % av	700.000
Viðareiðis	Vegin undir Leiti		
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		150.000
Hvannasunds	Ábøtur á "Nýggjubrúgv" o.a. í Sandoyarbugi		
	(Viðareiðis- og Hvannasunds kommunur í felag)		
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		250.000
	Leinging av atløgubryggjuni undir Frostvirkinum		
	(Viðareiðis- og Hvannasunds kommunur í felag)		
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð		400.000
	Leinging av atløgubryggjuni undir flakavirkinum		
	(Viðareiðis- og Hvannasunds kommunur í felag)		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð		400.000
Klaksvíkar	Bátahyl á Borðoyarvík		
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		700.000
	Bátaarmar í Klaksvík		
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt		140.000
	Bátahavnina á Borðoyarvík		
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) bygt		650.000
	Bátabrúgvar, asfaltering, ljós, vatn, v.m. við		
	bátahyl á Borðoyarvík		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð		400.000
Kunoyar	Bátahavn n.f. lendibrúnna í Haraldssundi		
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt		200.000
	Bátahavn í Haraldssundi		
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		150.000

Kommuna	Til	Upphædd
Elduvikar	Leinging av atlogusiðu i Funningsfirði	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Bátaspæl og ábotur á flotbrúgvar i Funningsfirði	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
Oyndarfjarðar	Deksbátahavnina	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	250.000
	Sunnari vegur oman í havnina o.a.	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
Fuglafjarðar	Bátahavnina	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
	Smábátahavnina	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
Gøtu	Bátahylin undir Gøtueiði	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
Runavikar	Bryggjubygging á Bakka á Glyvrum	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	400.000
	Lending i Rituvik	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Bátahyl á Glyvrum og atkomuveg	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Lending i Lamba	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	250.000
	Lending i Rituvik	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	200.000
	Lending i Lamba og veg oman	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahyl og lendingarveg á Bakka á Glyvrum	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Lendingina í Rituvik	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
	Bátahyl á Glyvrum	
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	100.000
Nes	Deksbátahavn og bátahavn i Oyrunum	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	150.000
	Deksbátahavn og bátadrátt i Oyrunum	
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	250.000

Kommuna	Til	Upphædd
Nes	Brimskaða á verjugarðin, dýping av bátahavn í Oyrunum	
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	400.000
Skála	Bátahyl í Skálafirði	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
	Bátahyl í Skálafirði, molhovd, dýping av bátahyli á Skála	
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	300.000
Sjóvar	Lending og atkomuveg Innan Glyvur	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Útbygging av bátahylinum í Heygsstoð	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	150.000
	Bátahyl í Heygsstað	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
	Lending á Moskranesi	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Atløgusiðu o.a. í bátahyli á Selatrað	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000
Sunda	Bátahyl á Oyrabakka	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
	Veg til øki til fóður- og slaktihús s.f. havnina a Oyri	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Bátahyl á Oyrabakka	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000
	Grótkasti úti á Oyri	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	250.000
	Brimskaði á grótkastið á Oyri	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	500.000
Eiðis	Bátabrúgv á Eiði	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	400.000
	Lending við Ljósá	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahyl við Ljósá	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	200.000
	Lendibrúgv í Svínáum	
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Bátahyl við Ljósá	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	150.000

Kommuna	Til	Upphædd
Funnings	Lending í Funningi	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	100.000
	Ábøtur á lendingina í Funningi	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	100.000
Haldórsvíkar	Ábøtur á atløgusiðu í Vík	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	200.000
Hvalvíkar	Vatnveiting til havnalagið	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
	Betongdekk o.a. á kaiokið	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	300.000
	Líðugtgerð av bátahylinum	
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	200.000
Hósvíkar	Atløgubryggja framvið vegnum í bátahyli í Hósvík v.m.	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
Kollafjarðar	Leinging av ytra armi o.a. í bátahyli við Sjógv	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	150.000
	Veg til havnaoki s.f. oyruna	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	150.000
	Bátahavn á Signabø	
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	300.000
Kvívíkar	Brimskaða	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
Vestmanna	Bátahyl Inni á Fjørð	
	(3. ársgjald av 7 ára játtan) bygt	200.000
Tórshavnar	Bátahyl í Kaldbak	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Argja	Bátahavn	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	400.000
	Framhald av bátahavnsarb. á Argjum	
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	1.000.000
	Lendingina í Norðadali	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	100.000
Kirkjubøar	Lending á Velbastað	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000
	Leinging av brimgarði o.a. á Velbastað	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000

Kommuna	Til		Upphædd
		flutt:	
Hests	Lendingarvegir í Koltri		
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð		400.000
Nólsoyar	Brimverja millum Horgina og Eiðið		
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		200.000
Sandavágs	Bátahavn		
	(3. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		800.000
	Bátahavn		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		1000.000
Miðvágs	Øking um bátahylin		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		200.000
	Viðkan av bátahylinum		
	(3. ársgjald av 7 ára játtan) ikki bygt		150.000
	Viðkan um bátahylin		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		300.000
Sørvags	Regulering av grótkasti v.m. í bátahavnini		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		100.000
	Dýping av bátahylinum		
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		150.000
Mykines	Bøting um lendingarviðurskiftini		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100 % av	500.000
Sands	Attogusíðu til bátar		
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		200.000
Skálavíkar	Dekkið e.f. fiskahúsið		
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		150.000
Húsavíkar	Brimskaði í Húsavík		
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		400.000
	Lending í Dali		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		100.000
	Bátahavn innanfyri Skarvasker		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		400.000
	Lendingina á Skarvaskeri		
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		300.000
	Bátahavnina		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) bygt		300.000

Kommuna	Til		Upphædd
Skúvoyar	Bátahyl		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	85 % av	500.000
	Bátahyl		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	85 % av	800.000
Hvalbiar	Lending í Nesi		
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		700.000
	Meirkostnað og bátasiðu í Nesi		
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		300.000
	Bryggja í Sandvik		
	(4. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		200.000
	Leingjan av bryggjuni í Sandvik		
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		350.000
	Lendingina í Nesi		
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		150.000
	Leinging av bryggjuni í Sandvik		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		200.000
	Planering av lendingaroki í Nesi		
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð		100.000
Tvøroyrar	Økið við bátahavnina (Bærentshavið)		
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		100.000
	Bátahyl undir Tvørábakka		
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		100.000
Fámjins	Brimverju og brimskaða		
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		75.000
	Brimverju og leinging av brimgarðinum		
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		100.000
Hovs	Lending í Tjaldavik		
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		100.000
	Bátabryggju til fiskaalarar		
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð		200.000
Porkeris	Veg til grótkastið		
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		100.000
Vágs	Økið til bátahavnina á Oyrunum		
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		250.00
Sumbiar	Bátahyl í Sumba		
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð		400.000

Kommuna	Til		Upphædd
Sumbiar	Bátahyl í Pollinum		
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð		300.000
	Brimskaða o.a. í Pollinum		
	(3. ársgjald av 7 ára játtan) bygt		300.000
	Atløgusiðu til bátar, planering, bátadrátt o.a. í Lopra		
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		100.000
	Brimverju av smoltstøð o.a. í Vikarbyrgi		
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt		200.000
	Pollin: bátahavn, brim- og bakkaverja		
	(2. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð		500.000
		Tilsamans kr.	27.515.000
	75 % av kr. 24.415.000 =	kr.	18.311.250
	85 % av - 2.600.000 =	-	2.210.000
	100 % av - 500.000 =	-	500.000
		Tilsamans kr.	21.021.250

Yvirlit í sambandi við lendingajáttanir og lendingargrunnin

Játtað frammanundan fyri 1989 til lendingar		21.021.250 kr.
Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31.12.1988		35.100.081 -
		56.121.331 kr.
Av játtanum fyri 1989 er goldið		1.854.048 -
		54.267.283 kr.
Í grunni pr. 31.12.1988	32.473.298 kr.	
Játtað 1989	26.000.000 -	58.473.298 -
Til góðar		4.206.015 kr.

U P P S K O T

til samtyktar

B. 1. Viðvikjandi samferðsluviðurskiftunum til eystan bygdirnar á Sandoynni.

Álagt verður Landsverkfroðinginum at kanna hvussu vegurin gjøgnum Liðina á Sandi kann útbyggjast.

2. Viðvikjandi samferðsluviðurskiftunum frá ferjuleguni á Gomlurætt til Tórshavnar.

Álagt verður Landsverkfroðinginum at kanna hvussu hetta vegasambandið kann útbyggjast, iroknað kanningar um møguliga gerð av tunnli yvir í Havnardal.

SAMFERÐSLUNEVNDIN, 21. mars 1989

John Petersen

Heini O. Heinesen

Lasse Klein

Edmund Joensen

Agnar Nielsen

Jógvan Adolf Johannessen

Niels Pauli Danielsen

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 103/1988 (vetrarting): Vegir og lendingar.

Eftir 1. viðgerð 29. mars 1989 varð málið beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við málinum, men setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Undir A. I: Vegir verður undir Sunda kommunu skoytt uppí:

"- veg á Norðskála 75.000"

og undir Kvívikar kommunu verður skoytt uppí:

"-leingjan av vegnum út á Nes til fiskivinnuøkið 75.000"

SAMFERÐSLUNEVNDIN, 29. mars 1988.

Heini O. Heinesen John Petersen Lasse Klein

Edmund Joensen Agnar Nielsen Jógvan A. Johannesen

Niels Pauli Danielsen

B r o y t i n g a r u p p s k o t

í

løgtingsmáli nr. 103/1988 (vetrarting): Vegir og lendingar.

Sum nýtt pkt. 3 undir uppskotinum til samtyktar, B, verður sett:

"3. Viðvikjandi samferðsluviðurskiftunum í Suðuroy.

Álagt verður landsverkfrøðinginum at kanna, hvussu samferðslan millum Hov og Øravík kann útbyggjast."

Á FØROYA LØGTINGI, 30. mars 1989.

John Petersen | J. A. Johannesen | Lasse Klein

Heini O. Heinesen | Agnar Nielsen | Edmund Joensen

Niels P. Danielsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

21. mars 1989

F. L. j. nr.

Tlf. 11080. Telex 81310 tinget fa. Telefax 14942. Postbox 64
Viðtalutíðir: kl. 10—15. Leygardag stongd

JP/IM

Føroya Løgting.

Løtingsmál nr. 106/1988: Løtingslóg um broyting í løtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1 verður aftanfyri "fóðurevni" sett: "(tó ikki fóðurevni til hundar, kettur, stovufuglar, akvariufuglar, o.t. húsdýr)".

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 9 fra 27. april 1961 om særlig indførselsafgift med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift foretages følgende ændringer:

1. I § 2, stk. 1 indsættes efter "foderstoffer": "dog ikke foderstoffer til hunde, katte, stuefugle, akvariefisk o.lign. husdyr)".

fóðurevni til hundar, kettur, stovufuglar, akvariufiskar o.t. húsdýr)".

2. Í § 2, stk. 2 verður pkt. 17 strikað.
3. Í § 2, stk. 2 verður pkt. 18 a strikað.
4. Sum nýggj § 2 c verður sett:
"Fyri motorakfør, ið verða skrásett sum hýru- og/ella skúlavognar verður serliga innflutningsgjaldið endurgoldið eftir nærri reglum settum av landsstýrinum."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

foderstoffer til hunde, katte, stuefugle, akvariefisk o.lign. husdyr)".

2. I § 2, stk. 2 udgår pkt. 17.
3. I § 2, stk. 2. udgår pkt. 18 a.
4. Som ny § 2 c indsættes:
"For motorkøretøjer, der registreres som hyre- og/eller skolevogne tilbagebetales den særlige indførselsafgift efter regler nærmere fastsat af landsstyret."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar.

Sambært galdandi lóg eru hýru- og skúlavognar undantiknir 22% gjaldinum. Men síðan lógin um skrásetingargjald kom í gildi, verða øll akfør tollað við 22% + 6% = 28% og ikki fyrr enn akfarið verður skrásett fæst at vita, um akfarið skal nýtast sum hýru- ella skúlavognur og hevur praksis tá verið, at tey 22% eru afturgoldin, tá akfarið er skrásett.

Orsøkin til broytingaruppskot til lóg um serligt innflutningsgjald er tann, at hýru- og skúlavognar ikki við innflutning kunnu frítakast fyri innflutningsgjald, tí tá tollingin fer fram, veit innflytarin ikki, um akfarið verður hýru- ella

skúlavognur. Hetta veit hann ikki, fyrr enn bilurin er seldur og hann skal skrásetast eftir lóg um skráseting av motorakførum v.m.

Tí er skotið upp, at pkt. 17 í § 2, 2. stk. verður strikað.

Í staðin verður sett inn nýggj § 2 c, sum loyvir endurgjald av serliga innflutningsgjaldinum (228), tá skráseting sum hýru- og/ella skúlavognur er framd.

Samstundis verður heimilað landsstýrinum at seta nærri reglur fyri, hvørji krøv skulu verða uppfylt fyri at fáa endurgjaldið, t.d. at keyparin hevur koyrikort til akstursvinnu, hevur akstursvinnuloyvi, at endurgjaldið stendur sum krav í bilinum um ikki eitt nærri ásett minstamark fyri vinnukoyring verður lokið o.s.fr.

Tollmyndugleikarnir hava stórar trupulleikar við at krevja endurgjaldið aftur, tá tað hevur vist seg, at lítið ella einki hevur verið koyrt vinnuliga við bilum, ið eru skrásettir sum hýru- ella skúlavognar og hava fingið hesar sømdir.

Høvi er nýtt at gera minni broyting í § 2. Tað verður hildið órímiligt at fóðurevni til hundar, kettur o.s.fr. er undantikið serliga innflutningsgjaldinum, tá hesar vørur samstundis hava serligt punktgjald í lógini frá 1950, har samsvarandi rætting verður gjørd í tollsatsinum.

Viðvíkjandi serútgjørdum alibátum (pkt. 18 a) verður víst til viðmerking til tolllógina frá 1950 (ad 7).

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 104/1988 (vetrarting): Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 21. mars 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mars beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir til at samtykkja uppskotið.

Sambært § 1, 4) verður sum nýggj § 2, c sett: "Fyri motorakfør, ið verða skrásett sum hýru- og/ella skúlavognar verður serliga innflutningsgjaldið endurgoldið eftir nærri reglum settum av landsstýrinum." - og verður henda reglugerð at lýsa sama dag, sum lógin verður lýst.

SKATTANEVNDIN, 31. mars 1989.

Törbjørn Poulsen Heini O. Heinesen Olaf Olsen

Agnar Nielsen Atli Dam

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 tinget fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardag stongt

14. apríl 1989

F. L. j. nr.
at tilskila í svari 433-2-1

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 105/1988: Broytingar í donsku myntlógini.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at lóg nr. 817 frá 21. desember 1988 "Møntloven" og fyriskipan nr. 139 frá 8. mars 1989 "om udmøntning af indenlandsk skillemønt" verða lýstar at galda fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Við nýggju donsku myntalógini og kongaligari fyriskipan givin við heimild í myntalógini er ásett, at 10-krónan, 5-krónan, 1-krónan og 25-oyrað skulu síggja annarleiðis út enn í dag og harafturat kemur eitt 50-oyra. 5- og 10-oyruni verða ikki gjørd longur, og frá 1. juli 1989 kunnu hesir báðir myntir heldur ikki nýtast sum gyldugt gjaldoyra.

Tá hesir báðir myntir ikki kunnu nýtast longur og minsti myntvirðin sostatt verður 25-oyrað, verður eisini ásett, at tá rindast skal ein oyraupphædd, sum ikki kann býtast við 25, skal henda upphædd avrundast til næstu upphædd, ið kann býtast við 25, uttan so, at annað er avtalað.

Sum ein fylgja av hesum, má løgtingslóg nr. 25 frá 1. mai 1973 um avrunding av ávisum oyrauppheddum setast úr gildi.

Landsstýrið mælir Løgtinginum til at góðkenna, at lógin og fyriskipanin verða settar í gildi fyri Føroyar.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/
/Jalgrim Hilduberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn,

14. apríl 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari) 433-2-1

Tlf. 11080 . Telex 81310 tlagms fa . Telefax 14942 . Postboks 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15, laygardag stongt

AMD/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 106/1988: Avtøka av løgtingslóg um avrunding av ávísum oyraupphæddum.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um avrunding av ávísum oyraupphæddum.	Lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om afrunding af visse ørebeløb.
§ 1. Løgtingslóg nr. 25 frá 1. mai 1973 um avrunding av ávísum oyraupphæddum verður avtikin.	§ 1. Lagtingslov nr. 25 af 1. mai 1973 om afrunding af visse ørebeløb ophæves.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1989.	§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. juli 1989.

Viðmerkingar:

Henda lógarbroyting er ein avleiðing av, at uppskot til samtyktar er lagt fyri løgtingið til góðkenningar av at setast skal í gildi fyri Føroyar lóg nr. 817 frá 21. desember 1988 "Møntloven" og fyriskipan nr. 139 frá 8. mars 1989 "om udmøntning af indenlandsk skillemønt".

Eftir hesum skulu 5- og 10-oyrað ikki longur vera gyldugt gjaldoyra, men 25-oyrað minsta gjaldoyra, og sambært donsku fyriskipanini § 6, verður, tá ið ein oyraupphædd verður goldin, sum ikki kann býtast við 25, henda avrundað til næstu upphædd, ið kann býtast við 25, uttan so, at annað er avtalað.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/Jálgrim Hilduberg

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. . mai 1989

F. L. j. nr.
vat tilskila í svari

Tlf. 11000 . Telex 81310 tinghs fa . Telefax 14942 . Pixtbox 64
Viðmøtistíð: Kl. 10—15. laygardag stongt

JH/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 107/1988 (eykating): Eykastuðul til fiskivinnuna.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um eykastuðul til fiskivinnuna.

§ 1. Játtað verður fiskivinnuni ein eykastuðul í fíggjarárinum 1989 uppá 180 mió. kr.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ekstra tilskud til fiskerierhvervet.

§ 1. Der bevilges fiskerierhvervet et ekstra tilskud i finansåret 1989 på 180 mio. kr.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Víst verður til viðmerkingarnar í øðrum tingmálum um broytingar í ymsum inntøkulógum.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

/
652/ Jalgrim Hilduberg

<u>løgtingsmáli nr. 107/1988 (eykating): Eykastuðul til fiskivinnuna.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 27. mai 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í 4 minnilutar.

Nevndin hevur havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum Anfinn Kallsberg, ið fráboðaði, at óbroyttir marknaðarprísir og óbroyttar fiskanøgdir fram til 7. august 1989 koma at kosta ráfiskagrunninum og nevndini fyri stuðulsgrunninum 82 mió. kr., íroknað nýtsluna hjá ráfiskagrunninum higartil upp á 25 mió. kr.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen og Niels Pauli Danielsen) mælir til, at játtaðar verða fyribils 90 mió. kr. at nýta í hesum tíðarskeiði, og er tá eftir minnilutans áskoðan rúm fyri athækka verandi prísir við 30 oyru/kg, hækka rakstrarstudningin fyri trol- og línuskip við 70 oyru/kg. og harumframt útróðrarbátar 30 oyru/kg. Spurningurin um nýggja meirijáttan verður at viðgera av nýggjum á ólavsøku.

Vísandi til hetta setir nevndi minniluti fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, 1. stk. ganga út orðini: "í fíggjarárinum 1989 upp á 180 mió. kr." og verður í staðin sett: "90 mió. kr. í tíðarskeiðinum 1. juni - 7. august 1989."	I § 1, stk. 1 udgår: "i finansåret 1989 på 180 mio. kr." og i stedet indsættes: "90 mio. kr. i perioden 1. juni - 7. august 1989."

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Tórbjørn Poulsen og Flemming Mikkelsen) tekur iki undir við uppskot landsstýrisins og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1 verður orðað soleiðis:	§ 1 formuleres således:
"§ 1. Játtað verður fiskivinnuni ein eykastuðul upp á 85 mió. kr. í tíðarskeiðinum 1. juni til 7. august 1989."	"§ 1. Der bevilges fiskerierhvervet et ekstra tilskud på 85 mio. kr. i tidrummet 1. juni til 7. august 1989."

Minniluturin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Allir fimm minnilutarnir vísa til viðmerkingar teirra í álitinum 113/1988 (eykating): Eykaskattur til landskassan.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juni 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TN. 11080 . Telex 81310 tlxgm fa . Telefax 14943 . Postbox 64
Afgreiðslutíð kl. 10—15. Leygardag stongt

27. mai 1989

F. L. j. nr.
(at tiskula i svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 108/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 um eykainnflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður "6%" broytt til: "8%".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstra indførselsafgift med senere ændringe.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 om ekstra indførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 1 ændres "6%" til: "8%".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Vísað verður til viðmerkingar í öðrum tingmáli um breytingar í ymsum inntøkulógum.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 108/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 27. mai 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í 5 minnilutar.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen og Niels Pauli Danielsen) vísir til viðmerkingar sínar í álitinum í løgtingsmáli nr. 112/1988 (eykating): Eykaskattur til landskassan, og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1, pkt. 1 verður soljóðandi:	§ 1, pkt. 1 formuleres således:
"Í § 1 verður "6%" broytt til: "7%".	"I § 1 ændres "6%" til: "7%".

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Heini C. Heinesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Tórbjørn Poulsen og Flemming Mikkelsen) tekur iki undir við uppskot landsstýrisins og setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1 verður orðað soleiðis:	§ 1 formuleres således:
"§ 1. Játtað verður fiskivinnuni ein eykastuðul upp á 85 mió. kr. í tíðarskeiðinum 1. juni til 7. august 1989."	"§ 1. Der bevilges fiskeri-erhvervet et ekstra tilskud på 85 mio. kr. i tidrummet 1. juni til 7. august 1989."

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Allir fimm minnilutarnir vísa til viðmerkingar teirra í álitinum 112/1988 (eykating): Eykaskattur til landskassan.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juni 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

TF. 11680. Telex 81310 fleygm fa. Telefax 14942. Postbox 64
Avgreiðslutíð: kl. 10—15. Ivgarsvong stongd

27. mai 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 109/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald.	lagtingslov om ændring i lagtingslov om rejseafgift.
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðaavgjald verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 37 af 26. maj 1988 om rejseafgift foretages følgende ændringer:
1. Í § 1, stk. 1, verður "200 kr." broytt til: "400 kr."	1. I § 1, stk. 1 ændres "200 kr." til: "400 kr."
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi fyri ferðaseðlar, ið verða seldir aftaná, at lógin er komin í gildi.	Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse, og er gældende for billetter, solgt efter lovens ikrafttrædelse.

Viðmerkingar:

Víst verður til viðmerkingar í øðrum tingmáli um broytingar í ymsum inntøkulógum.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

Løgtingsmáli nr. 109/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 27. mai 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður í fíggjarmálum tann 31. mai 1989 verið á fundi í fíggjarnevndini um tyrilliggjandi inntøkulógaruppskotini, og gjørdi landsstýrismaðurin vart við, at í løtuni er ósheppið at broyta reglurnar um ferðaavgjaldið og mælti til, at fíggjarnevndin umhugsaði trupulleikarnar við at seta í verk reglur, ið innibera hækkað avgjøld í eini tíð, bileggingar eru gjørdar fyri langari tíð síðani, og teir óvarsar, ið harav standast fyri ferðamannaídnaðin.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen, Niels Pauli Danielsen og Heini O. Heinesen) vísir til viðmerkingar sínar í álitinum í løgtingsmáli nr. 112/1988 (eykating): Eykaskattur til landskassan, og mælir til, at lógin fær gildi frá 1. oktober 1989, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 2 verður orðað soleiðis:	§ 2 formuleres således:
"Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1989."	"Denne lov træder i kraft 1. oktober 1989."

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Törbjørn Poulsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutarnir vísa annars til viðmerking teirra í álitinum í løgtingsmáli nr. 112/1988 (eykating: Eykaskattur til landskassan.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juni 1989.

Svend Aage Ellefsen Törbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 26. mai 1989

F. L. j. nr.
(at tilskila í svarinum)

Tlf. 11040. Telex 81310 tlxgm fa. Telefax 14941. Postbox 64
Avgreiðslutíðir kl. 10—15, laygardag stongt

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 110/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 23. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, pkt. 1 verður gjørd henda broyting:
   Í lbnr. 1.01 verður "2,75 kr." broytt til: "3,50 kr."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter m.m. med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 23. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgifter m.m. foretages følgende ændringer:

1. I § 1, pkt. 1 foretages følgende ændring:
   I lbnr. 1.01 ændres "2,75 kr." til: "3,50kr.".

2. Í § 1, pkt. 3 verða gjørdar hesar broytingar:
Í lpnr. 3.05. verður "80,00 kr." broytt til: "110,00 kr."
Í lpnr. 3.06 verður "95,00 kr." broytt til: "125,00 kr."
Í lpnr. 3.08 verður "80,00 kr." broytt til: "110,00 kr."
Í lpnr. 3.09 verður "95,00 kr." broytt til: "125,00 kr.".
Í lpnr. 3.11 verður "7,00 kr." broytt til: "11,50 kr." og "12,50 kr." broytt til: "17,00 kr.".
Í lpnr. 3.12 verður "7,00 kr." broytt til: "11,50 kr." og "12,50 kr." broytt til: "17,00 kr."
3. Í § 1, pkt. 25 verður gjørd henda broyting:
Í lpnr. 25.05 verður "66,00 kr." broytt til: "86,00 kr."
4. Í § 10 verða gjørdar hesar broytingar:

2. I § 1, pkt. 3 foretages følgende ændringer:
i lbnr. 3.05 ændres "80,00 kr." til: "110,00 kr."
i lbnr. 3.06 ændres "95,00 kr." til: "125,00 kr."
i lbnr. 3.08 ændres "80,00 kr." til: "110,00 kr."
i lbnr. 3.09 ændres "95,00 kr." til: "125,00 kr."
i lbnr. 3.11 ændres "7,00 kr." til: "11,50 kr." og "12,50 kr." til: "17,00 kr."
i lbnr. 3.12 ændres "7,00 kr." til: "11,50 kr." og "12,50 kr." til: "17,00 kr."
3. I § 1, pkt. 25 foretages følgende ændring:
I lbnr. 25.05 ændres "66,00 kr." til: "86,00 kr."
4. I § 10 foretages følgende ændringer:
I pkt. a ændres " 9,25 kr." til: "14,00 kr." og "16,00 kr." til: "20,50 kr.".

Í pkt. a verður "9,25 kr." broytt til: "14,00 kr." og "16,00 kr." broytt til: "20,50 kr.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingarnar í øðrum tingmáli um broytingar í ymsum inntøkulógum.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

pkt. 1: Hækking av bensingjaldinum.

Pkt. 2: Hækkingar av rúsdrekkatollinum.

Pkt. 3. Hækking av tubbakstollinum.

Pkt. 4. Hækking av avgjaldinum á føroyskt framleiddum øli.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/ Jalgrim Hilduberg

Á l i t

í

løgtingsmáli nr. 110/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 27. mai 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen, Niels Pauli Danielsen og Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutarnir vísa annars til viðmerking teirra í álitinum í løgtingsmáli nr. 112/1988 (eykating: Eykaskattur til landskassan.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juni 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

26. mai 1989

FR-110 Tórshavn.

F. L. j. nr.

TF. 11038 . Telex [illegible] . Telefax 14042 . Postkort nr.
Vanligur kl. 10—15. Innvarsel [illegible]

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 111/988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald við seinni broytingum.

§ 1.

Í Løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður "22%" broytt til "25%".
2. Í 2 a verður broytt soleiðis:
"Landsstýrið ásetur við kunngerð, at ymiskt byggitilfar: Cement, útilgjørt timbur,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig indførselsafgift med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift foretages følgende ændringer:

1. I § 1 ændres "22%" til "25%".
2. § 2 a ændres således:
Landsstyret fastsætter i henhold til bekendtgørelse at diverse byggematerialer: Cement, ubearbejdet træ, krydsfiner, byggeplader,

krossfiser, byggiplátur, gipsplátur, masonitplátur, laminatplátur, stein- og glasull og glastrevja, plastrávørur, taksteinur, tjørupapp, tak- og klædningsplátur, planglas í talvum, ótilgjørt jarn og stál (plátur, bjálkar, og profilir), ótilgjørt aluminium (plátur, bjálkar og profilir), rátt grót og marmor, eisini knúst, sandur og grús, lecca og pimpsteimur. Silicium. Stálmáttur (úr 5 og 6 mm kamstáli) sokallað "Rionet". Papprør til framleiðslu av betongelementum er undantikið frá innflutningsgjaldinum eftir hesi lóg.

Stk. 2. Landsstýrið ásetir við kunngerð nærri reglur fyri hvørji krøv, ið skulu lúkast sum treyt fyri fritøku fyri innflutningsgjaldi sambært stk. 1.

gipsplader, masonitplader, laminatplader, sten- og glasuld og glasfibre, plastråvarer, tagsten, tjærepap, tag- og beklædningsplader, planglas i tavler, ubearbejdet jern og stål (plader, bjælker og profiler), uberbejdet aluminium (plader, bjælker og profiler), utilhuggede klippestykker og marmor, også knust, sand og grus, lecca og pimpsten. Silicium. Stålmåtter (af 5 og 6 mm kamstål), såkaldet "Rionet". Paprør til fremstilling af betongelementer er undtaget for indførselsafgifter efter denne lov.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter i henhold til bekendtgørelse nærmere regler for hvilke krav, der skal være opfyldt som betingelse for undtagelse for indførselsafgiften jfr. stk. 1.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó fær § 2 a gildi frá 3. oktober 1988 at rokna.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse, dog får § 2 a gyldighed fra 3. oktober 1988 at regne.

Viðmerkingar:

Broytingin í § 2 a er orsakað av feilskriving, tá lógin varð broytt í oktober 1988. Partur av tekstinum varð dottin burtur. Uppskotið endurtekur alla greinina og ikki bert tað, ið varð dottið burtur.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

/

/ Jálgrim Hilduberg

Løgtingsmáli nr. 111/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 27. mai 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen, Niels Pauli Danielsen og Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórbjørn Poulsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutarnir vísa annars til viðmerking teirra í álitinum í løgtingsmáli nr. 110/1988 (eykating: Eykaskattur til landskassan.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juni 1989.

Svend Aage Ellefsen Tórbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 27. mai 1989 F. L. j. nr.

Tlf. 11030. Telex 81310 tlgrm fa. Telefax 14941. Postboks 64
Skrivstovutíð: kl. 10—15, leygardag stongt

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 112/1988 (eykating): Eykaskattur til landskassan:

Uppskot

til

løgtingslóg um eykaskatt til landskassan.	lagtingslov om ekstraskat til landskassen.
§ 1. Fyri skattaárið 1989 verður útskrivaður eykaskattur til landskassan.	§ 1. For skatteåret 1989 udskrives ekstraskat til landskassen.
Stk. 2. Skyldu at svara eykaskatt hava persónar og felløg v.m., sum eru skattskyldug í hesum skattaári sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinni broytingum.	Stk. 2. Pligt til at betale ekstraskat pålægges personer og selskaber m.v., som er skattepligtige i dette skatteår i henhold til lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 med senere ændringer.
Stk. 3. Hesin eykaskattur verður roknaður av skattskyldugu inntøkuni, sum hon verður ásett eftir reglunum í	Stk. 3. Denne ekstraskat beregnes af den skattepligtige indtægt, således som denne er fastsat efter reglerne i gældende

galdandi skattalógum, samanber stk. 4 og 5.

Stk. 4. Fyri persónar er henda lóg galdandi fyri inntøkur frá 1. januar 1989 (skattaárið 1989).

Stk. 5. Hvat felagum v.m. sambart § 1, stk. 1 nr. 8-15 í samtíðarskattalógini viðvíkur, og sum reka sjálvstøðuga vinnu, verður skatturin lagdur út á inntøkuna í tí inntøkuári, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1988.

§ 2. Eykaskatturin verður fyri persónligar skattgjaldarar roknaður við 6% av skattskyldugu inntøkuni omanfyri 200.000 kr. Fyri felløg v.m. verður eykaskatturin 6% av skattskyldugu inntøkuni. § 54, stk. 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinni broytingum er ikki galdandi fyri hesa lóg.

§ 3. Eftirhildin fyribilsskattur eftir reglunum í samtíðarskattalógini saman við eykaskattinum eftir hesi lóg má ikki vera meira enn 60% av tí einstøku útgoldnu A-inntøkuni.

skattelove, jfr. stk. 4 og 5.

Stk. 4. For personer er denne lov gældende for indkomst fra 1. januar 1989 (skatteåret 1989).

Stk. 5. Forsåvidt angår selskaber m.v. iflg. § 1, nr. 8-15 i kildeskatteloven, der driver selvstændig erhvervsvirksomhed, er grundlaget for skatteansættelsen det indkomstår, der udløber i eller falder sammen med kalenderåret 1988.

§ 2. Ekstraskatten beregnes for personlige skatteydere med 6% af den skattepligtige indtægt over 200.000 kr. For selskaber m.v. beregnes ekstraskatten med 6% af den skattepligtige indtægt. § 54, stk. 2 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 med senere ændringer gælder ikke for denne lov.

§ 3. Tilbageholdt foreløbig skat ifølge kildeskatteloven sammen med ekstraskatten ifølge denne lov må ikke overstige 60% af den enkelte udbetalte A-indtægt.

Stk. 2. Í førum har frestandi skattur eftir reglunum í samtíðarskattalógini er fluttur frá árinum fyri, kann eftirhildin fyribilsskattur eftir reglunum í samtíðarskattalógini saman við eykaskattinum eftir hesi lóg tó ikki vera meira enn 60% av útgoldnu A-inntøkuni.

Stk. 2. I de tilfælde, hvor restskat ifølge reglerne i kildeskatteloven er overført fra foregående år, kan tilbageholdt foreløbig skat ifølge kildeskatteloven sammen med ekstraskatten efter denne lov ikke overstige 60% af udbetalt A-indtægt.

§ 4. Landsstýrið fær heimild til at áseta tær reglur, sum eru neyðugt fyri, at henda lóg kann verða framd, so sum at áseta reglur, sum skulu tryggja, at persónar ikki kunnu flyta inntøkur frá tíðarskeiðinum, henda lóg er galdandi fyri.

§ 4. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte de for lovens gennemførelse nødvendige regler, herunder at fastsætte regler, som skal sikre, at personer ikke kan overføre indkomst fra det tidsrum, som denne lov er gældende for.

§ 5. Reglurnar í skattalógunum eru annars galdandi, tar annað ikki er ásett í hesi lóg.

§ 5. Reglerne i skattelovene gælder iøvrigt, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Til § 1:

Í hesi grein verður ásett, at lógin er galdandi fyri persónar og feløg, sum eru skattskyldug í hesum ári. Hetta merkir, at eisini persónar, ið eru undir avmarkaðari skattskyldu, koma undir lógina.

Til § 2:

Ásett verður, at § 54, stk. 2 í skattalógini ikki er galdandi fyri hesa lóg, og merkir hetta, at reglan um 50% hámarkið fyri samlaða inntøkuskattin av skattskyldugu inntøkuni, ikki er galdandi fyri eykaskatt eftir hesi lóg, men markið verður framvegis galdandi fyri vanliga inntøkuskattin.

Til § 3:

Ásett verður her, at hámarkið fyri, hvat afturhaldast kann í tí einstøku lønarútgjaldingini, verður 60%.

Til § 4:

Landsstýrið fær heimild til at áseta reglur, sum skulu tryggja, at inntøkur ikki verða fluttar frá tíðarskeiðinum, lógin er galdandi fyri, t.d. við at vinnurekandi broyta uppgerðarhátt, tíðspunkt fyri útgjaldingar av lønum verður broytt í mun til undanfarin ár, ella lønin verður lækkað í nevnda tíðarskeiði.

Finnbogi Ísakson
landsstýrismaður

Jálgrim Hilduberg

Viðmerkingar

Á fíggjarløgtingslógini fyri 1989 eru 325 mió.kr. settar av til Minstalon og annan stuðul til fiskivinnuna. Av hesum eru 55 mió.kr. ætlaðar Ráfiskagrunninum, men hetta rokkur ikki til. Síðst í mei eru 80 mió.kr. játtaðar yvir Ráfiskagrunnin. Nýggir avreiðingarprísir skulu koma í gildi 1. juni 1989. Viðlagt er yvirlit yvir teir avreiðingarprísir, sum Ráfiskanevndin hevur sett við gildi frá 1. juni 1989.

Landsstýrið hevur viðgjørt stoðuna hjá fiskivinnuni og ta búskaparligu stoðuna sum heild. Marknaðarprísirnir eru hækkaðir nakað í seinastuni, og roknað verður við, at teir hækka nakað aftrat sum frálíður, men kortini ikki so nógv, at tað slæpst undan at játta vinnuni stórri studningsupphæddir.

Komið er fram til, at neyðugt er at játta fiskivinnuni útivið 180 mió.kr. aftrat teimum 325 mió.kr., sum standa á fíggjarløgtingslógini, skulu fiskiflotin og fiskavirkini hava nakran møguleika at bera seg.

Tí leggur landsstýrið hesi uppskot fyri tingið at útvega neyðugan pening:

1) Uppskot um broytingar í tolllógini og lógum um innflutningsgjøld.

2) Uppskot um eykaskatt til landskassan.

Í hesum løgtingsmálinum verður skotið upp, at ein 6% eykaskattur verður lagdur á inntøku oman fyri 200.000 kr. og á (parta)feløg. Eyka persónsskatturin verður mettur at geva 55 mió.kr. og eyka felagsskatturin 10 mió.kr. ella tilsamans 65 mió.kr.

Sambært teimum uppskotum, sum verða løgd fram í dag, verða 163 mió.kr. kravdar inn í eyka tolli og skatti. Landsstýrið er til reiðar - undir viðgerðini í løgtinginum - at samraðast um at broyta lógina um beinleiðis persónsskatt soleiðis, at tær 55 mió.kr., ið fáast inn á henda hátt, verða umskipaðar til bundna samansparing í staðin. Peningurin verður í hesum fari goldin skattgjaldaranum aftur eftir nokrum árum. Fyri ikki at økja umsitingina, verður peningurin kortini kravdur inn yvir samtíðarskattaskipanina. Hetta ger tað neyðugt at heimila Likningarráðnum at nýta P-talið til ta bundnu saman-

sparingina eisini.

Tær ætlaðu inntøkurnar eru hesar:

Óbeinleiðis skattur

2% uppá eyka innflutningsgjaldið.....	50 mió.kr.
3% uppá tað serliga innflutningsgjaldið....	60 mió.kr.
200 kr. uppá ferðaseðilin uttanlands.....	10 mió.kr.
1,50 kr. uppá hvørja øl, skattaklassa I&II...	9 mió.kr.
30 kr. uppá liturin av spiritussi.....	10 mió.kr.
20 oyru uppá hvørja sigarett.....	14 mió.kr.
75 oyru uppa liturin av bensini.....	15 mió.kr.
Tilsamans.....	168 mió.kr.
Fyri sjey mánaðir (7/12).....	98 mió.kr.

Beinleiðis skattur

6% uppá inntøkur oman fyri 200.000 kr.....	55 mió.kr.
6% uppá (parta)felagsskattin.....	10 mió.kr.
Tilsamans.....	65 mió.kr.

Skattur og tollur tilsamans.....163 mió.kr.

Viðlagt er eitt yvirlit, sum vísir, hvussu nógvan eyka-skatt (samansparing) teir ymisku inntøkubólkarnir fáa.

Uppris um ætlað búskaparlig tiltøk

Fiskivinnumál

Fleiri nýskipanir innan fiskivinnuna eru í umbúnaði, og í einstokum førum verða uppskot løgd fyri løgtingið um broytingar. Í øðrum førum kunnu reglurnar broytast uttan lógarbroyting. Nevnast kunnu hesi tiltøk, sum ætlanin er at fremja.

1) Ráfiskagrunnurin verður tikin av við gildi frá 1. oktober 1989. Hetta er liður í einari umskipan, sum hevur til endamáls at geva marknaðarprísinum á fiskavørum størri ávirkan á prísasetingina. Tørvur verður framvegis á stuðningi úr landskassanum til fiskivinnuna. Ætlanin er, at politisku myndugleikarnir skulu áseta ein stuðning til tey ymisku fiskasløgini fyri eitt ávist tíðarskeið, td. 4 mánaðir. Síðani verður ásettur ein avreiðingarprísur td. 14. hvønn dag, sum lagar seg eftir marknaðarprísinum. Stuðningurin verður ikki broyttur í stuðningstíðarskeiðinum, hóast avreiðingarprísurin nækkar ella lækkar. Stuðningur og avreiðingarprísur verða goldin soleiðis, at fiski/útroðrarmaður fær løn sína útgoldna í einum.

2) Ein uppboðsskuskipan verður sett í verk, ið sum frálíður avloysir ta aseting av avreiðingarprísinum, sum er nevnd undir pkt. 1. Ætlanin er at royna eina slíka skipan á avmarkaðum øki í landinum frá 1. oktober 1989.

3) Í løtuni eru royndarprojekt á Bacalao í Havn og á Vestmanna Fiskavirki, sum ganga út uppá, at virkini gjalda pris fyri betri góðsku. Royndirnar hígartil hava verið positivar.

Roknast kann við, at tá uppboðssølan fer at virka, fer tað at loysa seg at gera sær ómak við góðskuni og soleiðis fáa betri pris.

Eisini verður arbeitt við at umskipa vrakarastovnin.

4) Serliga djúpvatnstrolararnir hava stóran studningstørv. Fyri at minka um hendan studningstørv hevur landsstýrið sum eina reynd loyvt Kjølbro-trolarunum at royna á djúpum vatni undir Føroyum og framleiða umborð. Úrslitini av hesum reyndum fara at vísa, um vit skulu nýta hetta tilfeingið á ein annan hátt, enn vit gera í dag.

Tað verður eisini neyðugt at fremja eina skipan soleiðis, at ein avísur prosentpartur av djúpvatnsfiskinum, sum í dag kemur inn á flakavirkini, verður seldur ótilvirkaður uttanlands, antin beinleiðis frá skipinum ella um flakavirki, men uttan um studningsskipanina.

Hetta fær avleiðingar á ravørutilgongdina hjá teimum flakavirkjum, sum í dag fáa nógvan djúpvatnsfisk, men avtøkan av Ráfiskagrunninum og tann ætlaða uppboðsskipanin kunnu eisini fáa eina positiva ávirkan bæði á ráfiskabýtið ímillum virkini, á góðskúna, framleiðsluna og studningstørvin.

5) Reglurnar fyri upphøggingargrunnin verða broyttar skjótast gjørligt við tí fyri eyga at fáa 10-20% av veiðuorkuni úr flotanum eftir 2-3 árum. Sambært galdandi reglum verður studningur veittur úr grunninum, svarandi til 80% av tí skuld, sum er á skipinum. Hóast meira enn 24 skip hava søkt um upphøggingarstuðul er onki skip farið úr flótanum enn orsakað av studninginum, tí at Fiskarabankin og Realkredittistovnurin góðtaka ikki bert at fáa 80%, men

krevja 100% av skuldini arturgoldin.

Landsstýrið umhugsar fleiri møguleikar. Ein møguleiki er at lata ávist krónutal sum studning úr Upphøggingargrunninum við miðalveiðuni hjá skipinum í tey seinastu árini sum grundarlagi. Tá skipið fær hendа studning, letur tað landsstyrinum fiskiloyvi aftur. Nýggj reglugerð um upphøggingarstuðul kemur í gildi 1. juli 1989.

Figgjarløgtingslógin

Hildið verður fram við arbeiðinum at tálma teimum almennu útreiðslunum. Figgjarløgtingslógin fyri 1990 verður nú fyrireikað at leggja fyri løgtingið í august 1989. Mannagongdin verður broytt í hesum sambandi.

Higartil hevur mannagongdin verið, at landsumsitingin hevur sent skriv út til tair almennu stovnarnar og biðið um teirra uppskot til figgjarætlan. Tey seinastu árini hevur samstundis í skrivinum loft verið lagt yvir ávisar útreiðsluhækkingar.

Síðani hevur landsstýrið gjørt uppskot til figgjarløgtingslóg og hevur í mongum førum skarvað burtur av teimum ynskjum, sum stovnarnir hava havt. Seinni eru broytingar eisini gjørdar í figgjarnevndini.

Nú verður mannagongdin, at landsstýrið ger uppskot til figgjarløgtingslóg, og hvør stovnur fær so tann partin av uppskotinum til ummælis, sum viðvikir hvørjum einstøkum stovni. Serstakar grundir skulu tala fyri, um útreiðslur, sum landsstýrið hevur skotið upp, skulu hækkast.

Roynt verður at fáa figgjarløgtingslógina fyri 1990 í

mesta lagi at vera a sama upphæddarstøði sum fíggjarlogtingslógin fyri 1989. Fyri at rokka hetta mal verður uppskot til fíggjarløgtingslóg gjørt út fra hesum fyritreytum:

1) Nýggj størv verða ikki normerað uttan í heilt serligum førum. Tá størv verða leys av natúrligari frágongd ella uppsøgn, tekur landsstýrið í hvørjum einstøkum føri støðu til, um neyðugt er at seta nýggj fólk.

2) Rakstrarútreiðslurnar til ymiskar tænastur skulu skertast.

3) Parturin á fíggjaløgtingslógini til grunnar verður ikki skerdur. Serligur roknskapur og reglur verða gjørd fyri hvønn grunn sær.

4) Farið verður undir at endurskoða serliga útreiðslukrevjandi lógir við tí fyri eyga at minka útreiðslurnar, har hetta er forsvarligt.

5) Ein skjóttarbeiðandi nevnd er sett at gera uppskot um, hvussu betri eftirlit kann fáast við gjaldføri landskassans og nýtsluni úr landskassanum og grunnunum.

6) Landsstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk at gera uppskot um samansparingarskipanir. Miðjað verður ímóti at leggja uppskot fyri tingið og avgreiða tey í august 1989.

Íløguætlan

Landsstýrið arbeiðir við at savna tilfar til eina ætlan fyri almennar íløgur fyri árini 1989 til 1993. Tær almennu íløgurnar í 1988 voru um. 1 mia.kr. Í samgonguskjalinum verður sagt, at tær almennu íløgurnar (landið og kommunurnar) mugi ikki fara upp um 700 mió.kr. í 1989.

Tilfarið frá stovnunum og kommununum er ikki heilt liðugt enn, men tað tykist greitt, at ynski eru um ilagur uppa einar 5 mia. kr. í nevnda tíðarskeiði ella 1 mia. kr. árliga.

Hetta er væl meira enn tað, sum landsstýrið heldur vera ráðiligt. Arbeitt verður tí við at skarva burtur av talunum, at útseta summar útbyggingar og at ráðfesta tær, sum skulu fremjast. Hetta arbeiðið skal vera liðugt í summar og kunngerast, tá uppskot um fíggjarlógtingslóg fyri 1990 verður lagt fyri løgtingið í august 1989.

Tær samlaðu ilagurnar skulu ikki fara upp um 600 mió.kr. í 1990, 600 mió.kr. í 1991, 650 mió.kr. í 1992 og 650 mió.kr. í 1993. Tó kunnu broytt betri búskaparlig viðurskifti loyva økingum í íløguuppnæddunum.

Samstundis verður ein meting gjørd av teimum privatu íløgum, sum roknast kann við tey komandi árin.

Í Tinganesi 27. mei 1989

Jógvan Sundstein Signar Hansen Tordur Niclasen

Annfinn Kallsberg Karl Heri Joensen Finnbogi Isakson

AT TEKJU FLOKKAR	SKATTA-PROSENT	MEÐAL-INNTØKA	SKT.-GJALDARAR 1987	SKT.-GJALDARAR ØKNAÐ	INNTØKA PR. BÓLK	SKATTUR PR. PERSON	SKATTUR PR. BÓLK
0- 10	0,00%	1,4	3.330	4.626	6.477	0,00	
10- 20	0,00%	15,5	1.805	1.880	14.102	0,00	
20- 30	0,00%	25,0	2.663	2.387	33.805	0,00	
30- 40	0,00%	35,0	2.054	1.578	64.450	0,00	
40- 50	0,00%	45,0	3.149	2.717	95.086	0,00	
50- 60	0,00%	55,0	1.884	2.194	98.726	0,00	
60- 70	0,00%	65,0	1.640	1.990	76.426	0,00	
70- 80	0,00%	75,0	1.457	1.410	91.661	0,00	
80- 90	0,00%	85,0	1.389	1.267	95.022	0,00	
90- 100	0,00%	95,0	1.003	1.111	102.917	0,00	
100- 110	0,00%	105,0	1.035	1.148	109.060	0,00	
110- 120	0,00%	115,0	1.053	1.125	117.901	0,00	
120- 130	0,00%	125,0	1.033	1.064	122.400	0,00	
130- 140	0,00%	135,0	1.159	1.302	133.272	0,00	
140- 150	0,00%	145,0	1.117	990	133.613	0,00	
150- 160	0,00%	155,0	1.140	1.006	146.933	0,00	
160- 170	0,00%	165,0	1.131	980	151.900	0,00	
170- 180	0,00%	175,0	1.094	967	159.505	0,00	
180- 190	0,00%	185,0	1.080	1.012	177.016	0,00	
190- 200	0,00%	195,0	976	982	181.890	0,00	
200- 220	0,00%	205,0	896	946	194.436	0,00	
220- 240	6,00%	225,0	1.767	2.140	454.712	0,75	1.69
240- 260	6,00%	247,5	1.540	1.619	384.461	2,25	1.66
260- 280	6,00%	267,5	854	1.295	339.982	3,75	4.85
280- 300	6,00%	287,5	608	945	271.750	5,25	4.96
300- 325	6,00%	312,5	392	658	205.136	6,75	4.40
325- 350	6,00%	337,5	234	491	166.757	8,25	4.03
350- 375	6,00%	362,5	223	336	121.863	9,75	3.54
375- 400	6,00%	387,5	155	247	98.696	11,25	2.78
400- 425	6,00%	412,5	126	198	82.177	12,75	2.63
425- 450	6,00%	437,5	92	139	63.438	14,25	2.11
450- 475	6,00%	462,5	63	120	55.939	15,75	1.89
475- 500	6,00%	487,5	69	86	43.738	17,25	1.68
500-9999	6,00%	547,6	331	436	105.443	18,85	17.93
T. T.			41.611	41.611	4.884.789		64.349

Avreiknarprisir - KOSTNAÐARVERÐLAG - Báðeikagrunnurin.

Kostnaðarverðlag 1. juni - 31. desember 1989

26/Maj/1989

	tons	Avreiknarprisir Prisskeið 01.06-31.08	01.09-31.12	Avrokn. prisur	pris-unnur	Stuðul/ avgjald (1.000 Kr
Toskur 1Ah	621	8,50	8,51	8,51	0,00	0
Toskur 1A	4.993	8,50	8,76	8,76	0,00	0
Toskur 1B	250	6,70	6,93	6,93	0,00	0
Toskur 2Ah	2.093	3,70	4,31	4,31	0,00	0
Toskur 2A	8.696	3,70	4,73	4,73	0,00	0
Toskur 2B	370	3,05	4,16	4,16	0,00	0
Ýsa 1A	6.358	7,00	8,00	8,00	0,00	0
Ýsa 1B	122	5,05	6,15	6,15	0,00	0
Ýsmá	3.889	4,85	1,96	1,96	0,00	0
Langa	1.601	6,40	5,13	5,13	0,00	0
Blálanga	1.386	4,90	1,54	1,54	0,00	0
Upsi 1A	25.647	3,05	2,12	2,12	0,00	0
Upsi 1B	1.406	1,80	2,03	2,03	0,00	0
Upsi 2	863	1,60	2,03	2,03	0,00	0
Hongaskur	9.095	4,85	1,34	1,34	0,00	0
Steinsuga	156	2,95	2,86	2,86	0,00	0
Kavtaska	376	12,80	14,91	14,91	0,00	0
Hvítingur	546	3,25	1,40	1,40	0,00	0
Svartkalvi 1	694	6,35	1,00	1,00	0,00	0
Svartkalvi 2	616	7,50	4,10	4,10	0,00	0
Gullaksur	179	2,15	1,42	1,42	0,00	0
Kalvi 1	79	9,60	11,66	11,66	0,00	0
Kalvi 2	301	17,15	16,06	16,06	0,00	0
Reyðsmerska	114	3,20	2,19	2,19	0,00	0
Tunga	319	8,50	11,51	11,51	0,00	0
Svartsýfiur	3.309	1,40	0,85	0,85	0,00	0
Toskarogn					0,00	0
Ypuarogn					0,00	0

Samanlagt: 70.778 tons kr. 0

Studningur pr. kg.: 0,00

Løgtingsmál nr. 112/1988 eykating: Eykaskattur til landskassan.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 17. mai 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í 5 minnilutar.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen og Niels Pauli Danielsen) førir fram:

Viðgerðin í fíggjarnevndini av løgtingsmálinum um meirinntøku til landskassan og meirjáttan til fiskivinnuna hevur bert enn týðiligari sannført minnilutan um tá tryglu støðu, okkara samfelag er komið í.

At støðan hjá fiskivinnuni er út av lagi vánalig, og at vinnuni tørvar munagóða og skjóta hjálp er eydsæð. Bert feskfiskaflotin hevur seinastu 4 árini akkumulerað eitt hall upp á 400 mió. kr. Fleiri av virkjunum eru eisini í fíggjarligari trongstøðu.

Samsæri landsstýrismannunum í fiskivinnumálum er atlanin hjá landsstýrinum at framja bæði bráðneyðug og eisini langsiktandi nýskipanir til ábøtur hjá fiskiskipaflotanum.

Tey bráðneyðugu tiltøkini levna um:

1. At hækka avreiðingarprísirnar,
2. at hækka rakstrarstuðningin til fiskiskipini,
3. at taka út úr stuðningsskipanini tey fiskaslag, sum nógvt sær eru minni enn 5% av heildarnøgdini og selja hesi til teir, sum gjalda besta prísin.

Meðan tey langsiktandi eru:

1. At taka ráfiskagrunnin av og geva marknaðarprísunum á fiskaprísum størri ávirkan til prísásetingina og miða ímóti at stuðningur og prísur verður goldin í einum.

1. at skipa fyri roynduppgerðarsølu av feskifiski,
2. at betra góðskuna á fiskinum og harvið fáa betri prís fyri
   útflutningsvøruna,
3. at útflyta ávísan part av djúpvatnsfiskinum beinleiðis til
   marknað uttan um uppmannsskipanina, og
4. at fáa kondemneringsskipanina at virka sum skjótast.

Soleiðis sum tann parlamentariska støðan nú er, er torført at meta um møguleikarnar fyri at fáa fram tey langtsiktandi tiltøkini.

Útvegir siga at verða fyrr fyri at hækka avreiðingarprísirnar og rakstrarstuðningin.

Minnilutin ásannar, at tað verður torvelt at fáa samtykt uppskot landsstýrisins um at játta 180 mió. kr. og setir tí fram broytingaruppskot í løgtingsmáli nr. 107: Ýkasstuðul til fiskivinnuna um at játta 90 mió. kr. í fyrsta umfari. so nógv mikið er til hækkaðar fiskaprísir og rakstrarstuðning fram til 7. august 1989. Minnilutin mælir landsstýrinum til á ólavsøku at søkja sær heimild frá løgtinginum, so hægru prísirnir og rakstrarstuðulin framhaldandi kunnu standa við. Hædd er tikin fyri meirkostnaðinum í inntøkuuppskotum minnilutans.

Broytingaruppskotið hongur saman við, at neyðugu inntøkulógirnar eisini verða samtyktar.

Minnilutin vísir í tí sambandinum á, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nevnir greitt nevndini frá, at gjaldføri landskassans er sera vánaligt og valla batnar í bráð, og at peningsumfarið annars í samfelagnum, og herundir gjaldføri bankanna, er trongligt.

Greitt er tí, at meirjáttan ikki kann veitast fyri verandi fíggjarlóg, hvørki burturav reguleringskonto ella líknandi konto. Nevnast kann eisini, at inntøkurnar higartil í ár frá landskassanum eru lægri enn nevnt á fíggjarlógini, soleiðis at alt bendir tann vegin, at eingin peningur verður til at taka á reguleringskonto við árs enda.

Gjaldføri landskassans kann samsvart landsstýrismanninum setast upp soleiðis:

Tokur peningur	38 mio. kr.
Kredittur í donskum tjóðarbankanum	100 mio. kr.
Skjótgrunnurin	120 mio. kr.
	248 mio. kr.
Fallin skuld til føroyskar peningsstovnar	30 mio. kr.
Avloysskattur til skattagjaldarar	30 mio. kr.
Flakavirkini (ráfiskagrunnurin)	30 mio. kr.
	190 mio. kr.
Gjaldføri netto	58 mio. kr.

og er hetta alt ov lítið til dagligu raksturin, og tá er eingin peningur á regulariongskonto og í grunni.

Tað er tí ábyrgdarleyst at tosa um at játta vinnuni pening uttan samstundis at vísa á, hvussu peningurin verður fingin til vega.

Samsvarandi hesum ásannar minnilutin tað neyðuga í at taka undir við landsstýrinum í tingmálunum nr. 108, 109, 110, 111 og 112. Kortini metir minnilutin tað skilabest at gera broytingar í uppskotum landsstýrisins í nr. 108 og 109, meðan lógaruppskot um tvungna samansparing og eykapartafelagsskatt verða sett í staðin fyri uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 112. Broytingin í tingmáli nr. 108 at hækka eykainnflutningsgjaldi við 1% í staðin fyri 2% verður gjørd til tess at sleppa barnaríkum familjum undan stórum príshækkingum á neyðsynjarvørum.

Við hesi broytingini minkar avlaða inntøkan til landskassan við 30 mió. kr. árliga, og til tess kortini at tryggja neyðugan kapitalflutningin til landskassan og til tess at broyta byrðar meiri rættvíst, verður skotið upp at taka 3% inn við tvungnari samansparing (í staðin fyri 6% í eykaskatti) og at hækka eykaskattin hjá partafalagum úr 6% til 8%.

Broytingin í tingmáli nr. 112 verður mett at geva eins nógv í inntøku sum broytingin í eykainnflutningsgjaldinum.

Í fyriliggjandi tingmáli nr. 112 verður sostatt sett uppskot fram um samansparing til landskassan í staðin fyri

uppskot landsstýrisins um eykaskatt. Fremsta ørsøkin fyri hesum er, at minniluttin leggur storan dent á varðveita 60% skattaloftið, sum ikki verður ansað, um innisavnaði peningurin verður verandi ogn hjá einstaklingunum.

Ætlanin er kortini, at samansparingin skal takast inn yvir samtíðarskattaskipanina og síðani pr. edv-viðgerð leggjast um til lán frá einstaka skattgjaldaranum til landskassan. Samansparda uppsparingin, sum verður forrentað við 4% p.a., verður at afturgjalda í juli 1993.

Ætlanin er at avseta pening í grunn til útgjaldingina á fíggjarlógunum fyri 1990, 1991 og 1992, soleiðis at útgjaldingarupphæddin ikki skal útvegast á einum fíggjarlóg.

Havast skal í huga, at naydugt verður at broyta lógina um p-talið í samband við tvungnu uppsparingina.

Minniluttin fer at seta fram uppskot hesum viðvikjandi millum 2. og 3. viðgerð av løgtingsmálinum.

Eftir uppskotinum um eykaskatt av partafeløgum verður partafeløgsskatturin í 1989 hækkaður við 8% í staðin fyri 6% fyri saman við samansparingini at góðgera minnilønirnar í samband við lækking av eykalønfrádráttinum.

Minniluttin metir, at tær langtíðarætlanir, landsstýrið hevur greitt frá í framliguskrivinum saman við munagóðum sparingum á inniverandi og komandi fíggjarlógum og øðrum neyðugum tiltøkum fara at venda gongdini rætta vegin.

Tí er neyðugt, at landsstýrið av neitum huga fer undir at spara eisini í verandi fíggjarlóg, og setur minniluttin fram uppskot til samtykt í so máta. Minniluttin mælir landsstýrinum í hesum sambandi til enn einaferð at stremma starvsetanarstøðgin hjá tí almenna, so ikki tey nógvu lýstu størvini á ymsu landsstovnunum verða sett.

Viðvíkjandi broytingini í løgtingsmáli nr. 109: Broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald er at siga, at tað av praktiskum ørsøkum ikki ber til at krevja hægri avgjald frá degi til dags, og serliga ikki hesa árstíðina, tá nógvir av ferðaseðlum er seldir ella bilagdir til ein áður kunngjørdan prís.

Meyðugt verður til, um lógin skal setast í verk, at lýsa hana við gildi nakað langt fram í tíðina, nevnliga 1. oktober 1989.

Samsvarandi hesum viðmerkingunum setir minnilutin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera so á bandi, at sparingar verða gjørdar á tíggjarlagsárinum fyri 1989 á vakstrarkonti upp á í minsta lagi 30 mió. kr.

Minnilutin (Svend Aage Ellefsen og Niels Pauli Danielsen) setir fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um samansparing til landskassan.

§ 1. Fyri skattaárið 1989 verður útskrivað samansparing til landskassan.
Stk. 2. Skyldu at spara saman hava persónar, sum eru skattskyldugir í hesum skattaári sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinni broytingum.
Stk. 3. Samansparingin verður roknað av skatt-

Løgtingslov om opsparing til landskassen.

§ 1. For skatteåret 1989 udskrives opsparing til landskassen.
Stk. 2. Pligt til at opspare pålægges personer, som er skattepligtige i dette skatteår i henhold til lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 med senere ændringer.
Stk. 3. Opsparingen beregnes af den skatte-

skyldugu inntøkuni, so-
leiðis sum hendi verður
ásett eftir reglunum í
galdandi skattalógum, sam-
anber stk. 4 og 5.
Stk. 4. Hendi lóg er gald-
andi fyri inntøkur frá 1.
januar 1989 (skattaárið
1989).

§ 2. Samansparingin verður
roknað við 8% av skatt-
skyldugu inntøkuni omanfyri
200.000 kr.

§ 3. Eftirhildin fyribils-
skattur eftir reglunum í
samtíðarskattalógini saman
við samansparingini eftir
hesi lóg má ikki vera meira
enn 60% av tí einstøku ú-
goldnu A-inntøkuni.
Stk. 2. Í førum har frást-
andi skattur eftir reglunum
í samtíðarskattalógini er
fluttur frá árinum fyri,
kann eftirhildin fyribils-
skattur eftir reglunum í
samtíðarskattalógini saman
við samansparingini eftir
hesi lóg tó ikki vera meira
enn 60% av útgoldnu A- inn-
tøkuni.

§ 4. Landsstýrið fær heim-
ild til at ásetа tær regl-
ur, sum eru neyðugar fyri,
at hendа lóg kann verða

pligtige indtægt, således
som denne er fastsat efter
reglerne i gældende
skattelove, jfr. stk. 4 og
5.
Stk. 4. Denne lov er gæl-
dende for indkomst fra 1.
januar 1989 (skatteåret
1989).

§ 2. Opsparingen beregnes
med 8% af den skattepligt-
tige indtægt over 200.000
kr.

§ 3. Tilbageholdt foreløbig
skat ifølge kildeskattelo-
ven sammen med opsparingen
ifølge denne lov må ikke
overstige 60% af den enkel-
te udbetalte A- indtægt.
Stk. 2. I de tilfælde, hvor
restskat ifølge reglerne i
kildeskatteloven er overt-
ført fra foregående år, kan
tilbageholdt foreløbig skat
ifølge kildeskatteloven
sammen med opsparingen ef-
ter denne lov ikke overstå-
ge 60% af udbetalt A- ind-
tægt.

§ 4. Landsstyret bemyndiges
til at fastsætte de for
lovens gennemførelse nød-
vendige regler, herunder at

framd, so sum at áseta reglur, sum skulu tryggja, at persónar ikki kunnu flyta inntøkur frá tíðarskeiðinum, henda lóg er galdandi fyri, har persónur doyr, flytir av landinum v.m.

§ 5. Reglurnar í skattalógunum eru annars galdandi, har annað ikki er ásett í hesi lóg.

§ 6. Tann samanspardi peningurin verður afturgoldin einstøku skattgjaldarunum saman við tilskrivaðu rentu upp á 4% p.a. frá juli 1992.

§ 7. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

faststørte regler, som skal sikre, at personer ikke kan overføre indkomst fra det tidsrum, som denne lov er gældende for, såfremt personen er død, er fraflyttet landet o.l.

§ 5. Reglerne i skattelovene gælder iøvrigt, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

§ 6. Det opsparede beløb tilbagebetales til den enkelte skatteyder tilligemed tilskrevne renter på 4% p.a. fra juli 1992.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðtak

til

Løgtingslóg um eykaskatt til landskassan.

§ 1. Fyri skattaárið 1969 verður útskrivaður eykaskattur til landskassan.
Stk. 2. Skyldu at svara eykaskatt hava felög v.m.,

Lagtingslov om ekstraskat til landskassen.

§ 1. For skatteåret 1969 udskrives ekstraskat til landskassen.
Stk. 1. Pligt til at betale ekstraskat pålægges selska-

sum eru skattskyldug í hesum skattári samkvæmt løgtingslóg nr. 36 frá 1. september 1983 við seinni broytingum.

Stk. 3. Hesin eykaskattur verður roknaður av skattskyldugu inntøkuni, soleiðis sum nevnda verður ásett eftir reglunum í gildandi skattalógum, samanber stk. 4 og 5.

Stk. 4. Henda lóg er galdandi fyri inntøkur frá 1. januar 1989 (skattaárið 1989).

Stk. 5. Hvat felagsum v.m. samkvæmt § 1, stk. 1 nr. 9-15 í samtíðarskattalógini viðvíkur, og sum reka sjálvstøðuga vinnu, verður skatturin lagdur út á inntøkuna í tí inntøkuári, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1988.

§ 2. Eykaskatturin verður 3% av skattskyldugu inntøkuni, § 54, stk. 2 í løgtingslóg nr. 36 frá 1. september 1983 við seinni broytingum er ikki galdandi fyri hesa lóg.

§ 4. Landsstýrið fær heimild til at ásetta tær reglur, sum eru neyðugt fyri,

bar m.v., som er skattepligtige i dette skatteår i henhold til lagtingslov nr. 36 af 1. september 1983 med senere ændringer.

Stk. 3. Denne ekstraskat beregnes af den skattepligtige indtægt, således som denne er fastsat efter reglerne i gældende skattelove, jfr. stk. 4 og 5.

Stk. 4. Denne lov er gældende for indkomst fra 1. januar 1989 (skatteåret 1989).

Stk. 5. Forsåvidt angår selskaber m.v. jfr. § 1, nr. 9-15 i kildeskatteloven, der driver selvstændig erhvervsvirksomhed, er grundlaget for skatteansættelsen det indkomstår, der udløber i eller falder sammen med kalenderåret 1988.

§ 2. Ekstraskatten beregnes med 3% af den skattepligtige indtægt. § 54, stk. 2 i lagtingslov nr. 36 af 1. september 1983 med senere ændringer gælder ikke for denne lov.

§ 4. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte de for lovens gennemførelse nød-

at henda lóg kann verða fram.

vendige regler.

§ 5. Reglurnar í skattalógunum eru annars galdandi, har annað ikki er ásett í hesi lóg.

§ 5. Reglerne i skattelovene gælder iøvrigt, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Niels Pauli Danielsen hevur umframt omanfyristandandi hesa serstøðu:

Annars vísir minnilutin (Niels Pauli Dandielsen) á, at tað er ikki óvanligt, tá lá tallur og gjøld verða løgd á og hækkað, at veita teimum endurgjald, lá orka minst og hava ongar inntøkumøguleikar.

Tí verður sett fram soljóðandi

V U p p s k o t

til

samtykkar

Álagt verður landsstýrinum at leggja lógaruppskot fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni um at hækka barnastyrkin sum endurgjald fyri hækkingum í innflutningsgjoldunum og somuleiðis at hækka samskiftisstudningin til pensjónistar.

Somuleiðis vísir minnilutin (Niels Pauli Danielsen) á tær kanningar, sum eru gjørdar viðvíkjandi serskatting av hjúnum, og tíl ta uppheddi, sum inntøkulógaruppskotini koma at geva landskassanum eisini næsta ár.

Tí verður sett fram eftirfarandi

Y f i r l ý s i n g

um

<u>samkomulag</u>

Álagt verður landsstjórninni að leggja fyrir Lögþingið í sjávarútvegsnefnd lögmannsskot um að skatta hjón við sjálvstøðar frá 1. januar 1990 at rokna.

Sín miðvikudag (Jørgen Thomsen og Vilhelm Johannesen) samdar, at fiskivinnunni tørvar meiri peningur fyri at tryggja óbroyttar avreiðingarstøðir tað, sum eftir er av árinum.

Burtur av játtanini á fíggjarlógini fyri 1989 til minstulon og annan stuðul til fiskivinnuna hevur ráðiskagrunnurin fingið tilluttaðar 60 mió. kr. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um eykaskatt til landskassan, sigur landsstýrið, at við endan av mai eru 80 mió. kr. farnar um ráðiskagrunnin, t.v.s. 15 mió. kr. meiri enn tann samlaða uppheddin fyri 1989.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini er komið fram, at tørvurin fram til 7. august er 92 mió. kr. Her eru tær 15 mió. kr., sum eru nýttar óskyldir játtanina fyri 1989, taldar við. Av 92 mió. kr. verða sostatt 57 mió. kr. at nýta í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 7. august.

Taka vit tørvin fram til 1. oktober, skulu 93 mio. kr. nýtast. Við tølunum 15 mió. kr., sum longu eru nýttar, verður sostatt neyðugt at játta 113 mió. kr., um tryggd skal fáast fyri óbroyttum avreiðingarprísum í hesum tíðarskeiði. Skulu vit tryggja óbroyttar prísir resting av árinum, er tørvur á at játta umleið 150 mió. kr. eftur at tølunum 60 mió. kr., sum ráðiskagrunnurin hevur fingið burtur av samlaðu játtanini á fíggjarlógini.

Umboð javnaðarfloksins vísa á, at politiska støðan er sera ógreið í løtuni, og at virkað verður undir ógvuligum óstryggum politiskum viðurskiftum. Soleiðis sum støðan er, kann minniluturin ikki taka undir við at játta peningur fyri eitt longri tíðarskeið, men heldur tað vera rætt og neyðugt at útvega peningur fyri eitt avmarkað tíðarskeið, t.d. fram til 7. august.

Javnaðarflokkurin heldur líka, at lagtingið undir verandi politisku umstøðum ikki samtykkja lógir um eykainntøkur til landskassan. Tá og um hetta verður gjørt, eigur tann politiska stoðan at vera greið. Hetta kann bert verða gjørt, um vit hava eina arbeiðsføra samgongu og eitt arbeiðsført landsstýri. T.v.s. tryggj politisk viðurskifti.

Sostatt kann Javnaðarflokkurin ikki taka undir við lantskulágaruppskotum landsstýrisins, men mælir til at tryggja ráðiskagrunninum 30 mió. kr. á annan hátt, soleiðis at vit fáa tryggd fyri ábroytum avreiðingarprísum fram til 1. august 1989. Spurningurin kann so takast upp av nýggjum, tá tingið kemur saman á ólavsøku.

Miðflokkurin heldur sum ein møguleika, at nenda uppheddin til ráðiskagrunnin fyrisíðis, til politiska stoðan er vorðin greið. Kann fáast til vega á tann hátt, at flytingar verða gjørdar innanfyri tá samlaðu játtanina upp á 108 mió. kr. til minstulon og annan stuðul til fiskivinnuna. Av hesum eru einar 150 mió. kr. eyrnamerktar higartil. Sostatt eru umleið 178 mió. kr. ertir at nýta í verandi fíggjarætlan.

Eftir landsstýrisins avgerð er játtanin á fíggjarlógini býtt soleiðis:

Ráðiskagrunnurin			fá mio. kr.
Stuðulsgoldini	173	-	-
Minstalon og minstaloyvingar	50	-	-
Serligi grunnurin til fiskivinnuna	15	-	-
Umsitsing	4	-	-
At taka til	13	-	-

Fram til 1. mai er nýtslan hendan:

Stuðulsgoldini	33	-	-
Minstalon og minstaloyvingar	-	-	-

Og fram til enden av mai er nýtslan við

Ráðiskagrunninum	30	-	-

Hesi tal benda á, at umleið 178 mió. kr. eru eftir av játtanini á fíggjarlógini fyri 1989.

Miðflokkurin er viðmerkt um, at landskassin er í gjaldførisvanduliðkum, og at tað tí er neyðugt at tryggja tokan pening í sambandi við tær flytingar, ið miðflokkurin her hevur mælt til. Her er fleiri møguleikar. Ein møguleiki er at nýta tvørkningsvarnin í donsku tjóðarbankanum. Ein annar møguleiki er at broyta reglurnar fyri oljugrunnin og taka eitt part av peningunum har.

Viðvíkjandi tilmæli frá miðflokkinum setir mentalurin fram

VI Upphæð

til

samtaka

Landsstjórninni verður falið - samhliða lagtingsins fjárlagaárinnar - at útvega nøkur pening og gera flytingar innanfyri játtanina til fiskivinnuna, soleiðis at avreiðingarprísarnir 31. mai verða ábroytir fram til 7. august 1989.

Málsviðurin (Heini S. Heinesen) fer hesar viðmerkingar:

Landskassans tilfeldi (likviditetur) hevur verið vánaligt í ár og serliga í seinastuni. 31. mai vóru bert 28 mió. kr. í landskassanum.

Veðhaldsgrunnurin var við ársbyrjan 1988 negativur við 14 mió. kr. Í 1989 eru 105 mió kr. settar av á fíggjarlógini. Men higartil í ár eru goldnar meira enn 120 mió. kr. úr grunnin, og enn eru nøkur útlegging ikki endaliga uppgjørd. Roknast kann við, at brúk er fyri væl meiri pening í hesum fíggjarári til effektiv veðhald enn tað, sum roknað varð við, tá fíggjarlógin varð samtykt.

Fiskaprísirnir eru framvegis lágir, og torvurin á peningi til fiskivinnuna er í minsta lagi tað, sum kann fáast lan eyka við lántakuuppsagnum landsstýrisins.

Landskassin lænti í fjør alna og árini frammanundan pening úr teim føroysku peningsstovnunum at gjalda fólki avlopsskatt í oktober 1988. Vanliga plagar hesin kassakreditturin at vera afturgoldin í mars árið eftir, men enn hevur landskassin ikki goldið peningsstovnunum tær 80 mió. kr. aftur, sum vórðu lænt í fjør.

Samstundis liggja fleiri stórar útgjaldingar fyri framman. Avlopsskatturin skal aftur í ár upp ímóti teimum 80 mió. kr. og skal gjaldast út í juli.

Barnaskyrkur, einar 60 mió. kr., skal gjaldast samstundis.

Termínagjöld í føroyskum peningsstovnum hjá skipum og virkjum, sum landskassin veðheldur fyri, og sum eru fallin til gjaldingar, eru vanliga lagd omán á lánini. Hesi falnu gjøld eru nú komin upp á 110 mió. kr. Tað dregst, at gjaldførið hjá peningsstovnunum er trongt, og vandi er tí fyri, at teir fara at krevja landskassan eftir einum parti av hesum peningi nakað skjótt.

Ætlanin er at fáa uppmoggingargrunnin at virka, so at nakað av veiðiorku fæst úr flotanum. 105 mió. kr. eru játtaðar grunninum, men peningurin liggur framvegis í landskassans kassaviditetil.

At enda kann verða nevnt, at skattainntøkan higartil í ár svarar til tað, sum er sett av á fíggjarlógini, meðan inntøkurnar av tolli og innflutningsgjøldum eru vel lægri enn mettar. Heldur hetta fram eftir, kann roknast við, at stívliga 100 mió. kr. minni koma í landskassan í ár enn tað, sum er sett á fíggjarlógina.

Alt bendir tí á, at brúk er fyri peningi í landskassanum. At taka eykaskatt inn sum samansparing, helst til eitt selnni landsstýri at gjalda aftur, er eingin loysn.

Minnilutin mælir tí tingnum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) er eins og øll onnur vitandi um, at ein av samgongufloKKunum hevur tikið seg burtur úr samgonguni.

Væntandi verður talan um nerra samrøður og møguliga eisini samráðingar.

Verður talan um nýggja samgongu, kemur hendan tvaleyst at taka støðu til hesa eykajáttan.

Verður nar aftur ímóti talan um nýval, heldur sambandsflokkurin tað vera tvingandi neyðugt at játta nóg mikið av peningi til at fiskivinnan kann halda fram fyribils til eftir ólavsøku.

Út frá hesum setur minnilutin fram soljóðandi uppskot:

VII b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

<u>løgtingsmál nr. 64/1989: Fíggjarløgtingslóg</u>

fyri árið

<u>1. januar - 31. desember 1989.</u>

Eykastuðul til fiskivinnuna:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í fíggjarløgtingslógini um eykajáttan til fiskivinnuna.

§ 1.

Í lagtingslóg nr. 13 frá 31. mars 1989: Fíggjar-lagtingslóg fyri árið 1. januar - 31. december 1989 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Undir § 16: Fiskivinna, sigling o.t.

verður

konto 16904/333017 mánaløn og annar stuðul til fiskivinnuna nækkað við 35 mio. kr.

mindsteløn og anden støtte til fiskeriet foreges med

Greinin er sett til 509.664 mio. kr.

Paragraffen ansættes til

2) Undir § 23: At leggja á ymsar grunnar v.m.

verður

konto 23104/383168 oljugrunnur lækkað við 45 mio. kr.

oliefond reduceres med

greinin verður sett til 100.741 mio. kr.

paragraffen ansættes til

3) Undir § 27: Reguleringarkonto

verður

konto 27007 verður lækkað við 40 mio. kr.

reduceres med

greinin verður sett til 10 mio. kr.

paragraffen ansættes til

§ 2.

Hesa lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi til og við 5. august 1989.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse og er gældende til og med 5. august 1989.

Sin minniluti (Lasse Klein) førir fram:

Viðmerkingar til lógaruppskotini.

Sjálvstýrisflokkurin ásannar, at tey uppskotini, sum nú eru til viðgerðar, á ongan hátt loysa teir trupulleikar, sum fiskivinna okkara er komin í, og kunnu uppskotini ikki metast sum partur av eini heild ella sum eitt stig á leiðini fyri at loysa trupulleikarnar í búskaparviðurskiftum føroyinga.

Men hvørja ferð endarnir ikki rokka saman, verður heitt á landsins myndugleikar um størri stuðul ella afturbering, sum tað nú verður nevnt.

Í allarflestu førum lata myndugleikarnir seg eftirlíka. Úrslitið er, at kreppan gerst størri og størri hjá fiskivinnuni. Veiðutrýstið hevur verið vaksandi, ikki minst tí allir, ið fáa sær fiskifør, rokna almennan stuðul sum sjálvfylgju. Nú flotin er orðin alt ov stórur, skal latast uppaftur meiri studningur fyri at halda lív í hesum alt ov stóra flota. Úrslitið verður sama veiðutrýst, men minni veiða, sama neyðarróp um størri stuðul næsta ár - og uppaftur størri um tvey ár.

Við hetta lag ganga ikki meir enn heilt fáa ár, til samfelagið ikki megnar at útvega tann stuðul, fiskivinnan hevur fyri neyðini, sjálvt um skattaprosentið verður 100 og tollurin margfaldaður.

Tá verður ikki talan um kreppu, tá er katastrofan komin yvir okkum, og tí kann hendan gongdin ikki halda fram.

Vit mugu gera okkum greitt, at nøgdin, ið veiðast kann, er avmarkað. Síðan mugu vit byggja eftir, hvørji før og hvørjir veiðuhættir eru mest gagnligir fyri landsbúskapin.

Tá talan er um fiskivinnuna, búskapar- og fíggjarviðurskifti okkara, er neyðugt við grundleggjandi broytingum. Sjálvstýrisflokkurin hevur víst á fleiri alternativar møguleikar, hvussu hetta skal gerast.

Ásannað verður tí, at trupulleikarnir verða ikki loystir eftir nøkrum fáum fundum, tímum ella døgun. Neyðugt

er við nýhugsan.

Ein grundleggjandi tíggjarlig broyting skal til, og tey tiltøk, sum nú eru fráboðað, nytta lítið og gera lítlan mun, tá hugsað verður um samlaða búskapin. Neyðugt er at fara til verka á ein heilt annan hátt, nógv meiri grundleggjandi.

Tingmenn og landsstýrismenn mugu ásanna, at teirra arbeiðsháttur skapar ongar grundleggjandi broytingar - hetta prógvar viðgerðin og tiltøkini tey seinastu mongu árini.

Orsøkin til, at Sjálvstýrisflokkurin fór upp í samgonguna millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokking og Kristiliga Fólkaflokkin var tann, at vit ætlaðu okkum at hava ávirkan á gongdina. Men vit mugu ásanna, at tey mál, sum í dag liggja á borðinum, hevur Sjálvstýrisflokkurin ikki havt ávirkan á. Tað sigur seg sjálvt, at tað ber ikki til hjá eini samgongu at koma við so grundleggjandi uppskotum á tingborð og so halda, at Sjálvstýrisflokkurin bara fylgir við av sær sjálvum.

Sjálvstýrisflokkurin sigur kortamel - hann tekur sum støðan er undir ongum umstøðum undir við at hækka skattamarkið upp um 50% - tí hvat verður tað næsta? Vit loysa onga kreppu í føroyska samfelagnum við at broyta skattamarkið - tvørturímóti.

Sjálvstýrisflokkurin nevur víst á sparingar, har byrjast skal við okkum sjálvum - tí almenna, løgtings- og landsstýrismonnum. Moralskt hava vit ongan annan møguleika. Vit kunnu ikki krevja av skattaborgarum landsins, at teir skulu gjalda/spara, tá vit sjálv ikki vilja gera tað.

Vit ásanna, at fiskivinnuni tarvar pening her og nú, og tí mælir sjálvstýrisflokkurin til, at váðiskagrunninum í fyrsta umfari verður játtað 95 mió. kr., soleiðis at fiskaprísirnir ikki fara niður um tað støði, sum teir høvdu 31. mai 1989.

Niðurstøðan av viðgerðini er, at sjálvstýrisflokkurin mælir til, at farið verður undir eina nágreinilliga viðgerð av øllum samfelagsins viðurskiftum, og at gjørd verður ein heildarloysn av øllum samfelagsbúskapi landsins við heilt konkretum ætlanum nøkur ár fram.

Onnur mál, sum sjálvstýrisflokkurin hevur lagt dent á skulu fremjast, er ein fíggætlan fyri alt samfelagið. Uttanlandsskuldin skal minkast við einum ávísum prosent talið eftir nærri ásettum áramálum, umframt keypiorkan hjá tí almenna, kommunum og privatum, verður tálmað sambært serstakari ætlan. Tá skal verða liðug skjótast gjørligt.

So nógvar skeivar metingar eru gjørdar, síðani samgongan varð skipað, og tí er grundarlagið undir samgonguni burtur, og vit hava staðfest, at tað er eingin vilji at fremja grundleggjandi broytingar í samfelagsstrukturinum, so sum sjálvstýrisflokkurin hevur skotið upp.

Minnilutin (Lasse Klein) mælir tí til, at fiskivinnuni verður játtaður hesin peningur:

Løgtingið áleggur landsstýrinum og fíggjarnevndini at finna sparingar á fíggjarløgtingslógini fyri 1989 upp á	25 mio. kr.
Flutt frá grunnum á fíggjarløgtingslógini fyri 1989 til fiskivinnuna	25 mio. kr.
Oljugrunnurin	20 mio. kr.
Reguleringsgrunnurin	15 mio. kr.
Tilsamans	85 mio. kr.

Í samband við sparingar á fíggjarløgtingslógini fyri 1989 er eisini bíðipeningurin til løgtings- og landsstýrismenn. Eftir at gjalda í ár eru 2.2 mió. kr. Upphæddin skal eisini strikast komandi árini. Sama skal verða galdandi fyri politiska upplýsing.

Út frá hesum setur minnilutin fram soljóðandi

VIII b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í fíggjarløgtingslógini um eykajáttan til fiskivinnuna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 13 frá 31. mars 1989:
Fíggjarløgtingslóg fyri árið 1. januar - 31. december 1989
verða gjørdar hesar broytingar:

1) Undir § 12: Heilsumál
verður:
konto 12318 Sjúkrahúsbygging í grunn lækkað
við 10 mio. kr.
Opførelse af hospitaler, i fond
med
Greinin verður sett til 304.800 mio. kr.
Paragraffen ansættes til

2) Undir § 13: Samferðslumál.
verður
konto 13061 Bergnol og brúgvagerð í
grunn lækkað við 10 mio. kr.
Tunnel- og brobygning i
fond reduceret med
Greinin verður sett til 304.800 mio. kr.
Paragraffen ansættes til

3) Undir § 14: Skúlamál
verður:
konto 14953/313302 Íbróttar og skúla-
grunn lækkað við 5 mio. kr.
Idræts- og skole-
byggefond reduceret med
Greinin verður sett til 417.470 mio. kr.
Paragraffen ansættes til

4) §§ 10 til og við 19 verða settar niður
við 1.3%. Lønir og aðrar fastar útreiðsl-
ur undantiknar. Tó verður bíðipeningurin
løgtings- og landsstyrismenn strikað.
Eftir at gjalda í ár eru 2.2 mió. kr.

Greinirnar verða minkaðar við 25 mio. kr.

5) Undir § 23: Að leggja í ymsar grunnar v.m.
verður:
konto 23104/383168 Olíugrunnur lækkað við
20 mió. kr. til 25 mio. kr.
Oliefond reduceres med
20 mio. kr. til
Greinin verður sett til 120.741 mio. kr.
Paragraffen ansættes til

6) Undir § 27: Reguleringarkonto
verður:
konto 27007 verður lækkað við 15 mio. kr.
reduceres med
Greinin verður sett til 35 mio. kr.
Paragraffen ansættes til

§ 2.

Hesa lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juni 1989.

Svend Aage Ellefsen Torbjørn Poulsen Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 24. mai 1989 F. L. j. nr. 1509-3-5-2-2

Tlf. 11500 . Telex 81318 . Telefax 14941 . Postbox 64
Viðtalutímar kl. 10—15. Ivirpurrans tannert

AMF/or

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 113/1988 (lovkating): Løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti.	Lagtingslov om tilskud i forbindelse med aflivning af furunkulosesmittet smolt.
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at nýta 75% av 7.649.060 kr. til stuðul til teir alarar, ið ikki kundu keypa smolt orsakað av sjúkuni furunkulosu og at leggja peningin úr landskassanum.	§ 1 Landsstyret bemyndiges til at bruge op til 75% af 7.649.060 kr. til tilskud til de opdrættere, der ikke kunne købe smolt på grund af sygdommen furunkulose og at disponere over beløbet af landskassens midler.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Í sambandi við avtøku av furunkulosusmittaðum smolti varð gjørd ein semja við alarar (samanber løgtingsmál nr. 107/1986).

Pkt. 2 í semjuni áleggur landsstýrinum at leggja uppskot um ein trygdargrunn fyri løgtingið. Hesin trygdargrunnur, sum umframt annað skuldi nýtast til, at alarar, sum ikki fingu smolt orsakað av furunkulosu, fingu ávist endurgjald.

Endurgjaldið var í tveimum.

1. Smoltstøðir, har smoltið varð avlívað.
   Hetta varð viðgjørt við serligari lóg og í eini serligari nevnd, sum arbeiðir á sama hátt sum húsdjóranevndin.

2. Endurgjald til teir sjógvalarar, sum ikki fingu smolt.
   Hetta hevur ikki nakra lógarheimild ella nakað fyridømi í samband við neyðslakting av djórum sambært húsdjóralógini, men í semjuni bant landsstýrið seg til at tryggja hesum alarum ávist endurgjald.
   Hetta skuldi gerast í einum trygdargrunni, har alararnir skuldu gjalda sín part og landsstýrið sín.
   Løgtingið tók uppskotið um trygdargrunn burtur úr lógaruppskotinum og lat standa eftir bert ein endurgjaldsgrunn, sum skal nýtast til endurgjald, har neyðslaktið fer fram.

   Sostatt er eingin lógarheimild komin um at endurjalda sjógvalarum, sum ikki fingu smolt.

   Á fundi 18. mars við umboð fyri alarar, umboð fyri Havbúnaðarfelagið og umsitingina hjá Føroya Landsstýri í alimálum varð avgjørt sambært løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987, um sjúkur hjá fiski, skeljadjórum og krabbadjórum at seta niðanfyri standandi metingarnevnd.
   Jógvan Joensen, Marius Thomasen, Jákup Sverra Joensen.
   Nevndin var liðug við arbeiði sítt 2. apríl og kom fram til eitt samlað endurgjald uppá 13.215.169 kr.
   Sambært løgtingsmáli nr. 152/1987 varð samtykt at veita alarunum upp til 6 mió. kr. í stuðuli av upphæddini.

Alararnir vóru ikki nøgdir og metti at hendan upphædd-
in ikki kundi hjálpa teimum úr kreppustøðuni, sostatt
verður skotið upp, at løgtingið heimilar landsstýrinum at
nýta 75% av 7.649.060 kr. til teir alarar, ið mistu smolt
orsakað av sjúkuni furunkulosu.

Anfinn Kallsberg
landsstýrismaður

Kjartan Hoydal

Á l l t

Í

Løgtingsmáli nr. 113/1988 (aykating): Løgtingslóg um stuðul í sambandi við avtøku av durunkulosesmittaðum smolti.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 27. mai 1989 og eftir 1. viðgerð 29. mai beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Viðvíkjandi endurgjaldsgrunninum, ið víst verður til í viðmerkingum landsstýrisins, er neyðugt, at landsstýrið útvegar sær reglugerð fyri nevnda grunn, og syrgir fyri, at grunnurin fer at virka.

FÍGGJARNEVNDIN, 30. mai 1989.

Svend Aage Ellefsen Lasse Klein Heini O. Heinesen

Niels Pauli Danielsen Flemming Mikkelsen Vilhelm Johannesen

Jørgen Thomsen

FØROYA LANDSSTÝRI

P. Tórshavn 30. maj 1989

Telefon ... Telex ... Telefax ...
Postgiro ... Bankagiro ...

Vort nr. 1500-1-11-4

Viðtakari

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 114/1988: Framhaldandi sáttmáli um føroyska fiskiveiðu út fyri serrandum í USA.

Tilskrift

Løgtingið gjørkendi, at fiskivinnusáttmálin við USA frá 1984 við broytingum verður framlongdur til 1. juli 1991.

Viðmerkingar:

Sjeggnum ustanríkisumboðsins og donsku sendistovuna í Washington hevur Føroya Landsstýri gjørt vart við, at ynski eru um at leingja sáttmálan millum donsku myndirnar og Føroya Landsstýri þórumegin og myndirnar fyri samveldisríkjum Norður-Ameriku hinumegin um føroyska fiskiveiðu út fyri serrandum samveldisríkjanna.

Sáttmálin varð endurnýggjaður í 1984 og gongur út 1. juli 1989 (§ 16, stk. 1). 1984-sáttmálin lagdur hjá, skjal 1.

Department of State hevur svarað aftur, at tey ikki vilja upp nakrar broytingar í ortingum. Landsstýrið hevur góðtikið hesar broytingar og eisini at sáttmálin hert verður longdur í 1 ár.

Tingi lond - hellur ikki ES - hava fingið betri treytir fyri endurnýgging, og tí varð mett, at neyðugt varð at góðtaka amerikonsku treytirnar.

Danska sendistovan hevur boðað State Departament frá skrivi 21. at landsstýrið góðtekur broytingarnar, og at sáttmálin kemur í gildi aftur at partarnir í nøtum hava boðað hvørjum øðrum frá, at avvarðandi myndugleikar hava góðkent sáttmálan. Hetta skal henda ístenn 1. juli 1989 fyri at nýggi sáttmálin skal taka við áðrenn gamli fer úr gildi.

Sáttmálin liggur nú í amerikonsku kongressini, har hann skal liggja í 60 dagar. Takar kongressin ikki beinleiðis støðu í málinum, er sáttmálin longdur fyri 2 ár.

Í Føroyum hevur landsstýrið á fundi 11. mai góðkent uppskotið. Málið skal síðani fyri Marknaðarnevndina, um tingið ikki er saman.

Broytingarnar:

Broytingarnar eru enn ein staðfesting av, at USA hevur ger sáttmálar við lond, sum binda seg til at stuðla amerikonskum áhugamálum.

Føroysk týðing av enska ontinginum í broytingunum í skjali 2 er sett niðanfyri:

1. Í grein IV, stk. 1 verða í staðin fyri ordini "fiski alla fiskaúrdráttin í sambandsríkjunum" sett: "bæði fiski alla fiskaúrdráttin í sambandsríkjunum, serliga fiskur og fiskaúrdráttur, sum fremmanda landið hevur umbiðið í sín lut."

2. Sum nýtt stk. 2 í grein IV verður sett:

"Um og í hvat mát slík lond samstarva við sambandsríkjunum og fremja verandi og nýggjar moguleikar fyri fiskaútfluttningi frá sambandsríkjunum við at keypa fiskafrátrátt frá virkjum í sambandsríkjunum og fremja handil við fiski við at keypa fisk og fiskaúrdrátt frá fiskimonnum í sambandsríkjunum, serliga fisk og fiskaúrdrátt, sum fremmanda landið hevur umbiðið í sín lut."

3. Í grein VII verður undan seinasta setningi sett:

"Meðan sovorðin gjøld skulu verða ásett uttan mismunur verður gjørdur, kann gjaldið vera hægri ella lægri alt eftir, inter alia, um eftir neting sambandsríkjanna, føroysk skip ella føroyingar fiska anadrom fiskaslog við uppruna í sambandsríkjunum í av stórum nøgdum ella Føroya landsstýri og stjórn Danmarkar ikki seta í verk nøktandi tiltøk, sum eru varðveiting og menning av fiskiskapinum í sambandsríkjunum at gagni."

4. Í grein VIII verður aftanfyri orðini "einbýtt búskaparbki" sett: "og øll havsøgdjór við uppruna í sambandsríkjunum, t.d. loðkópur í Norðurkyrrahavi, á víðum havi."

5. Í grein XVI verður dagfestingin 1. juli 1991 sett í staðin fyri 1. juli 1989.

Jógvan Sundstein
lógmaður

Kjartan Poydal

Nýval av formansskapi
Endurskipan av landsstýrinum

Ár 1989, hósdagin 22. juni var tingfundur. Formaðurin las skriv frá Jóngerð Purkhús, ið sigur tingstarvið frá sær, og biður um, at næsti maður á Tjóðveldisflistanum tekur sætið á tingi. Eftir tilmæli frá Jógvani við Keldu, Edmundi Joensen og Suna Jacobsen varð samtykt við 27-0 atkvøðum, at Finnbogi Isakson tekur sætið á tingi fyri Jóngerð Purkhús.

Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin boðaðu í skrivi frá, at hesir flokkar vóru gingnir saman í valbólk.

Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur boðaðu í skrivi frá, at hesir flokkar vóru gingnir saman í valbólk.

Síðani fór val av formansskapi fram. Agnar Nielsen varð valdur til tingformann. Jákup Lindenskov til 1. næstformann, Poul Michelsen til 2. næstformann og Hergeir Nielsen til 3. næstformann.

Løgmaður las skriv frá Anfinni Kallsberg, Karl Hera Joensen og Finnboga Isakson, ið bóðu um at verða loystir úr starvi sum landsstýrismenn. Hetta varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

Tordur J. Niclasen hevur ikki sent skriv um at verða loystur úr starvi sum landsstýrismaður.

Løgmaður skeyt síðani upp at velja hesi sum landsstýrismenn:

Olaf Olsen, Glyvrar,
Ivan Johannesen, Miðvági,
Jógvan I. Olsen, Toftir og
Jóngerð Purkhús, Velbastað.

Hetta varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

Val av fíggjarnevnd, marknaðarnevnd og fiskivinnunevnd

Ár 1989, fríggjadagin 30. juni vórðu hesar nevndir valdar av nýggjum:

Fíggjarnevnd:
Fastir limir:
Flemming Mikkelsen, Sune Jacobsen, Jógvan Durhuus, Heini O. Heinesen, Jørgen Thomsen, Svend Aage Ellefsen, Lasse Klein.
Tiltakslimir:
Eilif Samuelsen, Pauli Ellefsen, Finnbogi Isaksen, Karin Kjølbro, Vilhelm Johannesen, Poul Michelsen, Tórbjørn Poulsen.

Marknaðarnevnd:
Fastir limir:
Pauli Ellefsen, Eilif Samuelsen, Poul Michelsen, Jógvan við Keldu, Karin Kjølbro, Atli P. Dam, Tórbjørn Poulsen.
Tiltakslimir:
Edmund Joensen, Sune Jacobsen, Óli Breckmann, John Petersen, Hergeir Nielsen, Marita Petersen, Lasse Klein.

Fiskivinnunevnd:
Fastir limir:
Sune Jacobsen, Edmund Joensen, Anfinn Kallsberg, Jógvan Durhuus, Signar Hansen, Henrik Old, Niels Pauli Danielsen.
Tiltakslimir:
Flemming Mikkelsen, Jógvan í. Olsen, John Petersen, Hergeir Nielsen, Heini O. Heinesen, Jógvan Adolf Johannesen, Tordur J. Niclasen.

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 29. juni 1989

F. L. j. nr.
(at oplyses i svaret)

TL 11050. Telex 81310 tlxnm fa. Telefax 14942. Postboks 64
Kvgrendalsvegur 10—16, Jørgensarstovi

LG/ix

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 115/1988: Broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 um serligt innflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður "22%" broytt til: "27%".
2. § 2 a verður broytt soleiðis:
"Landsstýrið ásetir við kunngerð, at ymiskt byggitilfar: Cement, bearbeidað timbur,

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 om særlig indførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 1 ændres "22%" til "27%".
2. § 2 a ændres således:
"Landsstyret fastsætter i henhold til bekendtgørelse at diverse byggematerialer: Cement, ubearbejdet træ, krydsfiner, byggeplader,

krossfiner, byggiplötur, gipsplötur, masonitplötur, laminatplötur, stein- og glasull og glastrevja, plastrávörur, taksteinur, tjörupapp, tak- og klæðningsplötur, planglas í talvum, ótilgjört járn og stál (plötur, bjálkar, og profilir), ótilgjört aluminium (plötur, bjálkar og profilir), rátt grót og marmor, eisini knúst, sandur og grús, lecca og pimpsteinur, silicium, stálmáttur (úr 5 og 6 mm kamstáli) sokallað "Rionet", pappír til framleiðslu av betongelementum, er undantikið frá innflutningsgjaldinum eftir hesi lóg.

Stk. 2. Landsstýrið ásetir við kunngerð nærri reglur fyri hvørji krav, tá skulu lúkast fyri innflutningsgjaldi sambært stk. 1."

gipsplader, masonitplader, laminatplader, sten- og glasuld og glasfibre, plastrávarer, tagsten, tjærepap, tag- og beklædningsplader, planglas i tavler, ubearbejdet jern og stål (plader, bjælker og profiler), uberbejdet aluminium (plader, bjælker og profiler), utilhuggede klippestykker og marmor, også knust, sand og grus, lecca og pimpsten, silicium, stålmåtter (af 5 og 6 mm kamstål), såkaldt "Rionet", papir til fremstilling af betongelementer, er fritaget for indførselsafgifter efter denne lov.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere regler for hvilke krav, der skal være opfyldt som betingelse for fritagelse for indførselsafgiften efter stk. 1."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó soleiðis at § 1, nr. 3 gildi frá 12. oktober 1988 at rokna.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse, dog får § 1, nr. 3 gyldighed fra 12. oktober 1988 at regne.

Viðmerkingar:

Broytingin í § 2 a er orsakað av feilskriving, tá lógin varð broytt í oktober 1988. Partur av tekstinum varð tottin burtur. Uppskotið endurtekur alla greinina og ikki bert tað, ið varð tottið burtur.

Ivan Johannesen
Landsstýrismaður

Á l t t

<u>løgtingsmáli nr. 113/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um serligan innflutningsgjald.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 30. juni beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tvær minniluttar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Paul Ellefsen, Heini D. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins vísandi til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen	Flemming Mikkelsen	Sune Jacobsen
Jógvan Durhuus	Heini D. Heinesen	Jørgen Thomsen
	Lasse Klein	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 29. juni 1989

TIf. 11010. Telex 81318 lagma fa. Telefax 14942. Postbox 64
Skrivstovutíð: Kl. 10—15, laygardagur stongt

F. L. j. nr.
(at tilskila í svari)

LG/ik

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 116/1988: Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, pkt. 1, nr. 1,01 verður "2,75 kr." broytt til: "3,75 kr."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter m.m. med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 23. februar 1950 om indførselsafgifter m.m. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 1, pkt. nr. 1,01 ændres "2,75" til: "3.75 kr.".

2. Í § 1, pkt. 3 verður í nr.. 3.05. "80,00 kr." breytt til: "110,00 kr.", í nr. 3.06 "95,00 kr." breytt til: "125,00 kr.", í nr. 3.08 "80,00 kr." breytt: til "110,00 kr.", í nr. 3.09 "95,00 kr." breytt til: "125,00 kr.", í nr. 3.11 "7,00 kr." breytt til: "12,75 kr." og "12,50 kr." breytt til: "18,25 kr.", í nr. 3.12 "7,00 kr." breytt til: "11,50 kr." og "12,50 kr." breytt til: "17,00 kr."
3. Í § 1, pkt. 8, nr. 8.03 verður sett:
   Viðm.: Av gjaldinum verða 300,00 kr. pr. stk. + 30% sett í Sjónvarpsgrunninn.
4. Í § 1, pkt. 25, nr. 25.05 verður "66,00 kr." breytt til: "86,00 kr."
5. Í § 10, pkt a verður "9,25 kr." breytt til: "14,00 kr." og "16,00 kr." breytt til: "20,50 kr.".

2. I § 1, pkt. 3 foretages følgende ændringer:
   i nr. 3.05 ændres "80,00 kr." til: "110,00 kr.", i nr. 3.06 ændres "95,00 kr." til: "125,00 kr.", i nr. 3.08 ændres "80,00 kr." til: "110,00 kr.", i nr. 3.09 ændres "95,00 kr." til: "125,00 kr.", i nr. 3.11 ændres "7,00 kr." til: "12,75 kr." og "12,50 kr." til: "18,25 kr.", i nr. 3.12 ændres "7,00 kr.": til "12,75 kr." og "12,50 kr." til: "18,25 kr."
3. I § 1, pkt. 8, nr. 8.03 indsættes:
   Anm.: Af afgiften henlægges 300,00 kr. pr. stk. + 30% i TV-fonden.
4. I § 1, pkt. 25 nr. 25.05 ændres "66,00 kr." til: "86,00 kr."
5. I § 10 pkt. a ændres " 9,25 kr." til: "14,00 kr." og "16,00 kr." til: 20,50 kr.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Víst verður til viðmerkingarnar í tørum tingmáli um broytingar í ymsum inntøkulógum.

Broytingarnar í innflutnings- og framleiðslugjaldinum metast at geva hesar inntøkur resztna av árinum:

5% hækking av serliga innflutningsgjaldinum:	50,0	mió.	kr.
4,50 kr. liturin av øli:	4,5	-	-
30 kr. liturin av spiritus:	5,0	-	-
0,20 kr. uppá hvørja sigarett:	7,0	-	-
1,00 kr. uppá liturin av bensini:	10,0	-	-
	76,5	mió.	kr.

Fyri at fáa betri javnvág millum innflutningsgjaldið og framleiðslugjaldið á øli er innflutningsgjaldið hækkað við 5,75 kr. í staðin fyri 4,50 kr., men hetta ávirkar ivaleyst fyrst og fremst lutfallið í nýtsluni, men gevur kanska heldur meira í inntøku.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

pkt. 1: Hækkingar av bensingjaldinum. Fyri at útjavna mismunin millum diesel- og bensindrivin motorakfør orsakað av hækkan av bensingjaldinum, setur landsstýrið seinni í ár fram uppskot um hækkan av útjavningargjaldinum í lóg um vegskatt við teirri ætlan at hækka gjaldið, ið verður uppkravt fyri 1. hálvár 1990.

pkt. 2: Hækkingar av rúsdrekka- og øltollinum.

pkt. 3: Broyting í sambandi við, at lóg um gjald av sjónvarpsmóttakarum í grunn verður sett úr gildi.

pkt. 4: Hækkingar av tubbakstollinum.

pkt. 5: Hækking av avgjaldinum á føroyskt framleiddum øli.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður /
/ Eydfinnur Jacobsen

Løgtingsmál nr. 116/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald v.m.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 10. juni beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini eytt seg í ein meiriluta og tveir minniluttar.

Meiriluttin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini O. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins viðsandi til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen	Flemming Mikkelsen	Sune Jacobsen
Jógvan Durhuus	Heini O. Heinesen	Jørgen Thomsen
	Lasse Klein	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 29. juni 1989

F. L. j. nr.
(at nævnes i svari)

TF. 11048. Telex 81310 tlsma is. Telefax 14942. Postrok nr
Viðmælitímar kl. 10—15. Innvarsnar eftir

LS/1k

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 117/1988: Avtoku av lóg um toll.

Uppskot

til

Løgtingslóg um avtoku av løgtingslóg um broyting í tolllógini.

§ 1. Løgtingslóg nr. 35 frá 12. juni 1962 um broyting í tolllógini verður sett úr gildi.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om ændring i toldloven.

§ 1. Lagtingslov nr. 35 fra 12. juni 1962 om ændring i toldloven ophæves.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Reglurnar í hesi lóg eru eisini at finna í § 8 stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 frá 23. februar 1950 um innflutningsgjald við seinni broytingum (tolllógini).

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

721

10 11. 9.

Løgtingsmál nr. 117/1989 (eykating): Avtøka um lóg um toll.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 30. juni beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tvær minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini O. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins vísandi til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minnilutin (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen	Flemming Mikkelsen	Sune Jacobsen
Jógvan Durhuus	Heini O. Heinesen	Jørgen Thomsen
	Lasse Klein	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn, 29. juni 1989

F. L. nr.
(at udfyldes af kontoret)

Tlf. 11080 Telex 81310 lanres fa. Telefax 14947. Postboks 64
Skrivestue tid: 10—15. Jævnfør annonce

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 118/1989: Uppskot til løgtingslóg um toll á sjónvarpsmóttakarum.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um avtoku av løgtingslóg um toll á sjónvarpsmóttakarum.

§ 1. Løgtingslóg nr. 26 frá 8. mai 1969 um toll á sjónvarpsmóttakarum verður sett úr gildi.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om told af fjernsynsmodtagere.

§ 1. Lagtingslov nr. 26 af 8. maj 1969 om told på fjernsynsmodtagere ophæves.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Gjøldini eftir hesari lóg eru eisini at finna í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum (tolllógini).

Í løgtingsmáli nr. 116 verður viðmerking sett í tollslógina § 1, pkt. 8, nr. 8.03 um at 300,00 kr. pr. stk + 30% verður lagt í sjónvarpsgrunnin.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

Løgtingsmál nr. 119/1988 (eykating): Avtøka av lóg um toll á sjónvarpsmóttakarum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 30. juni batnt í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tvær minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini D. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins vísandi til viðmerkingarnar á síðunum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minnilutin (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen	Flemming Mikkelsen	Sune Jacobsen
Jógvan Durhuus	Heini D. Heinesen	Jørgen Thomsen
	Lasse Klein	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 29. juni 1989

F. L. j. nr. 30-12-45-16

TIL. 11 050 . Telex 81310 lagms fo . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15. Ivrigartíðir stongd

JK/ES

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 119/1988: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 36 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 33 verður sett sum nr. 12:

"Persónar, sum koma undir reglurnar í § 2, litra a og b, og sum búgva í Danmark/-Finlandi/Grønlandi/ Íslandi/Noregi ella Sverriki og sum undir bráðfeingis dvøl í Føroyum arbeiða í Føroyum í mesta lagi 100

lagtingslov om om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 36 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 33 sættes som nr. 12:

"Personer, der er omfattet af bestemmelsen i § 2, litra a og b, og som har bopæl i Danmark/Finland/-Grønland/ Island/Norge eller Sverige og som under midlertidigt ophold på Færøerne har beskæftigelse

dagar í sama almanakkaári, verða bert skattaðir í Føroyum av tí parti av inntøkuni sum fer uppum eina upphædd, sum sambært galdandi reglum er neyðugt til teirra uppihald, treytað av, at arbeiðið er skipað innan karmarnar hjá norðurlendskum ætlanum um umbýti av praktikk og frítíðararbeiði, og at arbeiðið er skipað gjøgnum Nordjobb. Upphæddir, sum verða hildnar neyðugar til uppihald verða ásettar av Líkningarráð Føroya fyri eitt ár og verða minkaðar í mun til longdina av dvølinum í Føroyum og alt almanakkaárið."

2) Í løgtingslóg nr. 33 frá 20. apríl 1989 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt verður gjørd henda broyting:

§ 2, 2. punktum verður orðað soleiðis:

"Tó koma pkt. 1) og 6) í gildi 1. januar 1990 og pkt. 2) og 7) eru galdandi fyri inntøkur frá 1. januar 1989".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi

på Færøerne i højst 100 dage inden for samme kalenderår, beskattes på Færøerne kun af den del af indkomsten, der overstiger et beløb, der efter gældende bestemmelse anses for at være nødvendigt til den pågældendes underhold, under forudsætning af, at arbejdet er udført inden for rammerne for nordisk program for udveksling af praktik og ferieansættelse, og at arbejdspladsen er formidlet af Nordjobb. Beløb, der anses for at være nødvendigt til underholdet, fastsættes af Færøernes ligningsråd på årsbasis og nedsættes i forholdet mellem opholdsperiodens længde på Færøerne og hele kalenderåret."

2) I lagtingslov nr. 33 af 20. april 1989 om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat og foretages følgende ændring:

§ 2, 2. punktum affattes således:

"Dog træder pkt. 1) og 6) i kraft 1. januar 1990 og pkt 2) og 7) er gældende for indkomst fra 1. januar 1989".

§ 2.

Denne lov træder i kraft

dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó er broyting í § 1, pkt. 1) galdandi frá 1. januar 1989.

dagen efter dens bekendtgørelse, dog er ændringen i § 1, pkt. 1) gældende fra 1. januar 1989.

Viðmerkingar til 1):

Fyriliggjandi uppskot til broytingar í skattalógini hevur til endamál at bøta um tá avleiðing ið stendst av, at Løgtingið fyrr í ár broytti skattaprosentið hjá persónum undir avmarkaðari skattaskyldu úr 33 í 42% av A-inntøkuni.

Seinastu árini er samskiftið millum norðurlond nógv økt, serstakliga hava ungfólk haft áhuga sjálvi av at kunna seg um viðurskiftini í hinum norðurlondunum.

Hesin áhugi verður skipaður gjøgnum tey Norrønu Feløgini. Eisini unglingar úr Føroyum leita til hini norðurlondini at arbeiða um summarið, og áhugin hjá ungum úr hinum norðurlondunum at koma til Føroya er stórur.

Øll Norrøn Feløg í Norðurlondunum harmast um, at tað er tarvum ógjørligt hjá ungum at koma til Føroya í ár vegna broytingini í skattalógini. Tey, saman við Norrøna Felagnum í Føroyum hava heitt á bæði Føroya Landsstýri og Føroya Løgting um at bera so í bandi, at ungfólk aftur í ár kunnu leita til Føroya at arbeiða í teirra fritíð.

Viðmerkjast skal at skattaprosentið fyri "nordjobbarunum" í hinum norðurlondunum liggur millum 15 - 35% av bruttoinntøkuni.

Viðmerkingar til 2):

Broytingin í hesi lóg er orsakað deils av vantandi fylgibroyting í § 2 til § 1, pkt. 7) í uppskotinum til løgtingslógini, sum aftaná viðgerð í løgtinginum varð beind til viðgerðar í løgtingsins skattanevnd at arbeiða viðari við málinum sum millumtinganevnd, og deils av eini vantandi fylgi-

broyting í § 2 tii § 1, pkt. 8) í nevnda uppskoti til løgtingslógina.

Av misgáum eru broytingarnar sostatt ikki rættaðar í samsvar við tað, sum ætlanin var.

Ivan Johannesen
landsstýrismaður

Í

Løgtingsmál nr. 119/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. juni 1989 og sendir 1. viðgerð 30. juni beint í fíggjarnevndina.

Nevndin nevnir viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini sýtt seg í ein meirilluta og tvær minnalutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Suna Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini D. Holmsgaard og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins viðsandi til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minnilutin (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen — Flemming Mikkelsen — Suna Jacobsen

Jógvan Durhuus — Heini D. Holmsgaard — Jørgen Thomsen

Lasse Klein

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

Tlf. 11080 . Telex 81310 fiagra fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Kontortímar: Kl. 10—15, leygardag stongt

28. juni 1989

F. L. j. nr.
at tilskila svarið 430-12-45-16

JK/ik

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 20/1988: Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Uppskot

til

Løgtingslóg um bundna uppsparing.	Lagtingslov om bunden opsparing.
§ 1. Persónur, sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum sambært § 1, nr. 1) - 6) í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, skal gjalda inn til bundna uppsparing eftir reglunum í hesi lóg.	§ 1. Personer, der i henhold til § 1 nr. 1) - 6) i lagtingslov nr. 86 fra 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer er fuldt skattepligtige på Færøerne, skal indbetale til bunden opsparing efter reglerne i denne lov.
Stk. 2. Uppsparingarskyldan fellur tó burtur, um skattskyldan heldur uppat.	Stk. 2. Opsparingspligten bortfalder dog såfremt skattepligten ophører.
§ 2. Útrokningargrundarlagið fyri bundnu uppsparingini er tann fyribilsskrásetta skattskylduga inntøkan.	§ 2. Beregningsgrundlaget for den bundne opsparing er den foreløbige skattepligtige indtægt.

Stk. 2. Tann bundna uppsparingin verður ásett sum niðanfyri tilskilað:

Er skattskyldugi inntøkan minni enn 110.000 krónur verður eingin bundin uppsparing krevd.

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður bundið kr.	av kr.	ella av rentum %
110.000	150.000	0	110.000	2%
150.000	200.000	1.400	150.000	5%
200.000		3.900	200.000	7%

Stk. 3. Bundna uppsparingin saman við eftirhildnum A-skatti, eftirstøðum og frestandi skatti kann í mesta lagi verða 65% av hvørjari lønútgjalding.

Stk. 4. Tann soleiðis uppkravda uppsparing er endalig sbr. tó 5. stk.

Stk. 5. Í teimum førum, har útrokning av uppsparingini í fyribilsskattaskránni víkir frá útrokningini í ársuppgerðini við meira enn eini ávísari upphædd, er líkningarráðnum heimilað at uppkrevja/útgjalda munin. Upphæddin verður árliga ásett av líkningsráðnum.

§ 3. Tann bundna uppsparingin fellur til gjaldingar saman við fyribilsskattinum.

Stk. 1. Den bundne opsparing fastsættes som nedenfor anført.

Er den skattepligtige indtægt mindre end kr. 110.000 opkræves ingen bunden opsparing.

Er den skattepligtige indtægt kr.	men mindre end kr.	er ingen kr.	af kr.	og af resten %
110.000	150.000	0	110.000	3%
150.000	200.000	1.200	150.000	5%
200.000		3.700	200.000	7%

Stk. 2. Den bundne opsparing tilligemed indeholdt A-skat, restancer og restskat kan ikke overstige 65% af den enkelte lønanvisning.

Stk. 4. Den således opkrævede opsparing er endelig, jfr. dog stk. 5.

Stk. 5. I de tilfælde, hvor beregning af opsparing i forskudsregistreringen afviger fra beregningen i årsopgørelsen med mere end et bestemt beløb, er ligningsrådet bemyndiget til at opkræve/udbetale forskellen. Beløbet fastsættes årligt af ligningsrådet.

§ 3. Den bundne opsparing forfalder til betaling

Stk. 2. Uppsparingin verður sett á bundna konto í føroyskum peningastovni, og verður rentað við tí til eina og hvørja tíð galdandi hægstu innlánsrentu. Henda renta er skattafrí.
Stk. 3. Uppsparingin fyrsta árið fer í landskassan, smb. tó § 4, 2. stk.
Stk. 4. Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur um hvussu uppsparingin verður bundin.

§ 4. Tann bundna uppsparingin verður saman við tilskrivaðum rentum afturgoldin fjórða árið.
Stk. 2. Uppsparingin fyri 1989 verður tó av landsstýrinum í seinasta lagi 1. juli 1992, rentað við 5% p.a., sett inn á bundna konto sum ein serlig eftirlønarskipan, og verður peningurin útgoldin eigaranum í fyrsta lagi tá ið hann verður 65 ár, við deyða ella gjaldstrot.
Stk. 3. Uppsparingin fyri 1990 verður útgoldin 1. oktober 1994, og uppsparingin fyri tey fylgjandi álmanakkaárini verður útgoldin hvønn 1. oktober fjórða árið.

sammen med den foreløbige skat.
Stk. 2. Opsparingen indsættes på en bunden konto i et færøsk pengeinstitut og forrentes med den til enhver tid gældende højeste indlånsrente. Denne rente er skattefri.
Stk. 3. Opsparingen det første år tilfalder landskassen, jfr. dog § 4, stk. 2.
Stk. 4. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler om hvordan opsparingen bliver bundet.

§ 4. Den bundne opsparing tilbagebetales sammen med tilskrevne renter i det fjerde år.
Stk. 2. Opsparingen for 1989 skal dog af landsstyret senest den 1. juli 1992, forrentet med 5% p.a., indsættes på bunden konto som en særlig pensionsordning, og beløbet skal først udbetales ejeren, når han er fyldt 65 år, ved død eller konkurs.
Stk. 3. Opsparingen for 1990 udbetales den 1. oktober 1994, og opsparingen for de følgende kalenderår udbetales hver den 1. okto-

Stk. 4. Afturgjalding fer tó fram, tá iv tann uppsparingarskyldugi kemur í gjaldstrot ella doyr. Somuleiðis fer afturgjalding fram, tá iv hin uppsparingarskyldugi verður 65 ár, tó í fyrsta lagi eitt ár eftir at henda lóg er komin í gildi.

§ 5. Tann uppsparingarskyldugi kann ikki krevja upphæddina útgoldna ella á annan hátt ráða yvir tí inngoldnu upphæddini, so leingi uppsparingarupphæddin er bundin. Tann bundna uppsparingin kann í sama tíðarskeiði ikki verða fyri úttøku, veðsetast, avhendast, verða nýtt sum móttrokning ella á annan hátt verða fyri rættarsókn.

§ 6. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um fyrisiting av lógini, herundir reglur um inngjalding og afturgjalding av bundnari uppsparing.

§ 7. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

ber i det fjerde år.
Stk. 4. Tilbagebetaling finder dog sted, såfremt den opsparingspligtige går konkurs eller afgår ved døden. Ligeledes finder

tilbagebetaling sted når den opsparingspligtige er fyldt 65 år, dog tidligst 1 år efter at denne lov er trådt i kraft.

§ 5. Den opsparingspligtige kan ikke kræve beløbet udbetalt eller på anden måde råde over de indbetalte beløb sålænge opsparingsbeløbet er bundet. I samme tidsrum kan der i den bundne opsparing ejheller foretages udlæg, pantsætning, afhændelse, modregning eller på anden måde retsforfølges.

§ 6. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler om lovens administration herunder regler om ind- og tilbagebetaling af den bundne opsparing.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen.

Viðmerkingar:

Sitandi samgonga hevur viðgjørt stóðuna hjá fiskivinnuni og tað búskaparliga støðuna sum heild. Marknaðarprísirnir eru hækkaðir nakað í seinastuni, og roknað verður við, at teir hekka nakað afturat sum frálíður.

Amerikanski dollarin hevur í seinastu tíðini verið fyri munandi hekking, hetta ávirkar aftur prísin á okkara fiskavørum tann positiva vegin, men kortini ikki so nógv, at tað sleppst undan at játta vinnuni stórri studningsuppheddir. Komið er fram til, at neyðugt er at játta fiskivinnuni útvið 180 mió. kr. afturat í 1989 skulu fiskiflotin og fiskavirkini hava nakran møguleika at halda fram. Tí leggur landsstýrið hesi uppskot fyri tingið at ítvega neyðugan pening.

Til tess at tálma nýtsluna í samfelagnum, fer landsstýrið hervið at skjóta upp at seta í gildi lóg um bundna uppsparing.

Uppsparingin fyrsta árið fer í landskassan.

Landskassin skal fyri 1. juli 1992 hava goldið hesa upphædd, renta við fá p.a., inn á pensiónsuppsparingar hjá viðkomandi uppsparurum.

Uppsparingin komandi árini verður eftir avtalu millum landsstýrið og føroysku peningastovnarnar, í tann mun, tað er búskaparliga forsvarligt, bundin uttanlands.

Uppsparingin verður bundin í 4 ár, og rentað sum innskot í bankabók.

Bundna uppsparingin, ið ásett verður í hesi lóg, verður mett at geva 110 mió. kr. fyri 1989. Upphæddin verður krevd inn saman við skattinum í tí tíðarskeiði, sum eftir er av hesum ári.

Orsakað av at 1989 árið er hálvrunnið og peningurin verður innkrevdur við kumulativari innkrevjingarskipan, kemur innkrevjingin at verða serliga stór tá fyrstu tíðina. Hesum sleppst tó ikki undan, um ein uppsparingarskipan skal fáast at virka eftir stuttari tíð.

Uppsparingarskipanin er gjørd so einføld sum til ber fyri at hon kann virka beinan vegin og verða bílig at gera og umsita. Hetta hevur tó teir vansar, at skattgjaldarin ikki sær

hvussu nógv er afturhildið til uppsparing av tí einstøku inntøkuni, men hetta er tó ikki atvitað tann viðvíkjandi frádráttarlógini í dag og munurin millum A-inntøku og forvunna upphædd. Líkningarráð Føroya kann tó upplýsa um, hvussu nógv mett verður, at skattgjaldarin ekal gjalda í uppsparing. Tó sæst á ársuppgerðini frá líkningarráðnum, hvat tað er bundin uppsparing og hvat er skattur.

Tann kumulativa skiftan ger, at skatturin er sera fjavnur frá lágtjalding til hátjalding. Fyri at fyribyrgja hesum, verður ein broyting gjørd í A-skattaskipanini, sum ger at skatturin verður meiri javnur gjøgnum árið.

Neyðugt er at gera tað afturhildnu uppsparingina endaliga. Tá er umsitingarliga ógjørligt at broyta uppsparingina. Tvørtur fært ein broyting er til líkningina. Tá er heimild til at gera broyting, um uppsparingin tykist serliga órímilig.

til § 1. Lógin er galdandi fyri persónar, tá eru undir fullari skattskyldu í Føroyum. Hetta merkir, at persónar, tá eru avmarkað skattskyldugir í Føroyum, felóg v.m. og deyðsbúgv koma ikki undir lógina.

til § 2. Í januar mánað aftaná inntøkuárið er endað, verður endaliga gjørt upp, hvussu stór uppsparingin er av tí samlaðu fyribilsinngjaldingini.

Av tí samlaðu fyribilsinngjaldingini verður fyrst frádroknað innroknaður frestandi skattur og síðani uppsparingin. Restin verður síðani bókskrivað sum goldin fyribilsskattur.

Hetta merkir, at uppsparingin ikki verður broytt sjálvt um sjálvuppgávan vísir eina ávísa skattskyldugu inntøku enn tá væntaðu skattskyldugu inntøkuna, og heldur ikki um broytingar verða gjørdar til álíkningina seinni.

Líkningarráðið verður heimilað í kunngerð at gera serligar reglur, ið frávikja nevndu hovuðsreglu, har tann innkravda uppsparingin tykist at vera órímilig.

til §§ 3 og 4. Tann bundna uppsparingin verður sett á konto í føroyskum peningastovni. Hetta verður gjørt á tann hátt, at

tað verður sett á stovn ein konto í hvørjum peningastovni fyri hvørt ár sær.

Í skattaskránni verður hildið skil á, hvussu nógva uppsparing hvør persónur sær eigur pr. ár.

Í sambandi við útgjalding av uppsparingini, tá er gjørd í árunum 1990 og seinni, verður tilskrivaða rentan í peningastovnum umroknað til eitt eykagjald, ið verður útgoldið saman við uppsparingini.

Fólkatingsmaður

Jørgen Jacobsen

<u>Løgtingsmál nr. 122/1989: eykating: Løgtingslóg um bundna uppsparing.</u>

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 19. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 20. juni beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 1. juli 1989 og hevur undir viðgerðini havt samráðing við stjórnan fyri líkningarráð Føroya til tess m.a. at lýsa tekniskar spurningar í sambandi við fyriliggjandi lógaruppskot.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í sin meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Sverd Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini O. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Meirilutin ásannar, at stoðan hjá fiskivinnuni er sera hættislig, og at fíggjarligu stoðan bæði hjá landskassanum og samfelagnum sum heild er trupul.

Meirilutin tekur tí undir við tí neyðuga í at útvega landskassanum tørvandi gjaldføri.

Tikið verður til eftirtekt, at inntøkur landskassans kunnu fáast til vega á ymiskan hátt, og at áskoðanirnar hesum viðvíkjandi kunnu vera ymiskar.

Til dømis kann ætlað alla menn harðala leggjast á beinleiðis ávirkaðan óbeinleiðis skatt.

Eftir fyriliggjandi uppskotunum nr. 115: Broyting í løgtingslóg um serligt samfelagsgjald, 116: Broyting í løgtingslóg um samfelagsgjald v.m., 120: Løgtingslóg um bundna uppsparing og 121: Eykaskattur til landskassan er ætlanin at sleppa undan at taka beinleiðis skatt, burtursæð frá eykapartafelagsskattinum, men í staðin fyri verður skotið upp at seta í verk bundna samansparing hvørs samlaða innskot í hesum fíggjarári í fyrsta umfari fer í landskassan.

1. juli 1992 verður innskotið goldið einstaka borgar-

anum aftur og verður tá sett inn á bunana konto til serliga eftirlan.

Herumframt verður peningur lovegaður við hækkaðum innflutningsgjøldum.

Undir 1. viðgerð komu fram ymiskar áskoðanir um í hvønn mun ávísar inntøkuuppheddir skuldu taka lut í samansparingini.

Til tess at kunna lagtingið um uppheddirnar, tær einstøku inntøkurnar skulu spara saman, er lagt við yvirlit frá Likningarráð Foroya hesum viðvikandi.

Samboert yvirlitinum skal nevnast sum dømi, at fyri kr. 115.000,- skattskyldug inntøka verður árliga samansparingin kr. 150,-, fyri kr. 125.000,- kr. 450,-, fyri kr. 135.000,-, kr. 750,-, og fyri kr. 145.000 kr. 1.050,-.

Samanlagt skulu umleið 1.000 einstaklingar við skattskyldugum inntøkum millum 110 túsund og 150 túsund gjalda 2,4 mió. kr. árliga til uppsparingina.

Hóast hesar uppheddirnar eru lágar, geva tær kortini hesum møguleika at verða við.

Meirilutin leggur dent á, at nýggja samgongan til tess at fáa betri úrslit á fíggjarliga økinum, hevur sett sær fyri at gera munandi sparingar, bæði tá tað snýr seg um samfelagsfløgur og rakstur.

Samanumtikið ferð meirilutin fram, at skal nakað munagott gerast føroyska búskapinum til frama, er neyðugt at fremja tey av landsstýrinum ætlaðu tiltøk sum liður í royndini at endurreisa búskapin í landinum og nevnir hetta sín pris.

Ein minniluti Jørgen Thomsen: harmast og ætlar tá framferð, sum landsstýrið og samgongan hava synt í sambandi við viðgerðina av hesum málum.

Málini vóru framlogd seinnapartin hósdagin 29. juni. Tá varð roynt at fáa málini til 1. viðgerð sama dag. Men við tað at samgongan ikki var mannað, og andstøðan nótmælti hesi mannagongd, varð hetta av ongum. Dagin eftir - fríggjadagin 30. juni - var samgongan mannað og farið varð undir viðgerðina eitt samdegur eyrr enn tingskipanin loyvir.

Eftir 1. viðgerð vóru málini send í fíggjarnevndina. Í fíggjarnevndini vardi viðgerðin av hesum álvarsmálum bert í

tveir tímar. Nevndin fekk ikki meira tíð til viðgerðina. Hetta kann javnaðarflokkurin undir engum umstøðum góðtaka. Eftir øllum at dømma skulu bæði 2. og 3. viðgerð eisini fara fram uttan um reglurnar í tingskipanini.

Javnaðarflokkurin kundi hugsað sær at savna ymiskt tilfar og gjørt ymiskar útrokningar, bæði viðvíkjandi tørvinum hjá fiskivinnuni og eisini avleiðingum, sum inntøkulógaruppskot landsstýrisins fáa fyri tey einstøku búsarhaldini og einstaka borgaran.

Minniluttin kundi hugsað sær, at fíggjarnevndin fekk høvi til at halda fundir við m.a. peningastovnarnar, búskaparráðið, hagdeildina, landsbankan, Føroya gjaldstovu, Føroya tollstovu, fiskivinnuráðið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, bæði á sjógvi og landi. Men hesum hava samgongumeðlimirnir forðað fyri við ikki at nýta tí neyðugu tíðina til viðgerðina.

Javnaðarflokkurin hevur bæði í skrift og talu og eisini undir viðgerðini í tinginum sagt sína mein um, at tað er vist á aðrar møguleikar, men bæði undir viðgerðini í tinginum og í fíggjarnevndini hevur samgongan víst aftur allar tíðar møguleikar og givið til kenna, at hon vil framja landsstýrisuppskotini óbroytt. Tað er tí til fánýtis hjá javnaðarflokkinum at koma við broytingaruppskotum.

Eftir fyriliggjandi upplýsingum fáa flestu skattgjaldarar ein sykaskatt seinnu helvt av 1989. Fyri inntøkur omanfyri 100.000 kr. verður talan um 6%, fyri inntøkur omanfyri 150.000 kr. 10%, og fyri inntøkur omanfyri 200.000 kr. 14%. Fyri tey komandi árini verður talan um eina bundna samanspæring. Inntøkubólkarnir, sum eru nevndir frammanfyri, skulu spara ávikavist 3, 6 og 7%.

Saman við hækkingini í serligu inntøkuskattingsgjaldunum og tollhækkingunum verða so tungar byrðar lagdar á borgararnar, serstakliga lág- og miðalinntøkurnar, at eftir javnaðarflokksins meting verða fleiri ríkin frá húsi og heimi.

Vísandi til frammanfyristandandi kann javnaðarflokkurin við undantak av løgtingsmáli nr. 121: Sykaskattur til landskassan (partafelagsskattur), ikki taka undir við uppskotum landsstýrisins og setir eingi uppskot fram.

Tá annar minnilutin, Lasse Aleim, ásannar, at fiskivinnuni tørvar meiri gening fyri at tryggja avreiðingarprísirnar.

Ongar samlaðar útroknningar eru gjørdar ella fyriliggja, hvussu nógvan gening fiskivinnuni tørvar aftrat í ár. Heldur einki verður sagt um, hvussu nógv samlaðu tiltøkini, sum landsstýrið ætlar at seta í verk, koma at kosta, men eingin tvi tykist verða um, at fiskivinnuni tørvar einar 140 mió. kr. aftrat verandi játtan, og mælir sjálvstýrisflokkurin til at játta hesa upphædd, hóast somgongan nevur fyrðað fyri nágreiniligari viðgerð av hesum máli.

Umboð sjálvstýrisflokksins vísir á, at undir viðgerðini av hesum uppskotum varð teimum noktað at fáa umboð fyri verkafeløgini inn á fundin. Heldur ikki var møguligt at gera nágreinaligar útroknningar. Hvat ein miðal føroysk familja var fer fyri at gjalda inn til tað almenna aftrat verandi skattum, avgjaldum o.s.fr.

Miðaltalið, sum hvør skattgjaldari skal gjalda aftrat í ár, eru kr. 13.800,00. Tað er burturvið at innkrevja meiri skatt og toll til tað almenna, og undir viðgerðini vísti sjálvstýrisflokkurin á, at 1989 fíggjarlógin er hækkað við umleið ½ milliard í mun til 1988, og tí eigur peningurin at fáast til vega yvir verandi fíggjarlóg.

Sjálvstýrisflokkurin heldur ikki, at tað kann vera rætt, at vanligi føroyski skattaborgarin skal nú gjalda gildi fyri vitleysar tiltøgur í fiskivinnuna, og hevur undir viðgerðini eftirlýst rottu samansetingina av flota okkara.

Tað, at Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin nava funnið saman í somgongu, hevur einki samband við at hjálpa føroysku fiskivinnuni alla føroyska búskapinum upp á fætur aftur, men fyri at hjálpa egnu fíggjarkreppu, sum hvør einstakur teirra umboðar. Men fjala yvir egin mistøk royna teir nú við ørðum at fjala egna skapta fíggjarkreppu, og tvinga skattgjaldaran at gjalda rokningina fyri teirra egnu gerðir.

Sjálvstýrisflokkurin er vorðin sannfordur um, at tað er eingin orsøk at fara at tal skattaborgaran eftir ti penningi, sum tørvar fiskivinnuni, hann liggur jú í fíggjarlógini

ig bankunum og ikki í gongapunginum hjá Palleba, har er ikki neira at heinta.

Um so er, at lógaruppskot samgongunnar verður samtykt, er vandi fyri, at fleiri familjur verða riknar frá húsi og heimi.

Verða uppskot samgongunnar samtykt, er talan um stórstu revsingartøre fyri vanliga lontakaranum nakrantíð í Føroya sogu, og hetta motmælir sjálvsstýrisflokkurin harðliga.

Tá talan er um fiskivinnuna, búskaðar- og fíggjarvið-urskift landsins, so er neyðugt við fiskiligum broytingum, m.a.:

1) studningsskipanin
2) tal á skipum
3) fiskavirkjum
4) góðsku.

Tey tiltøk, sum eru fráboðað, nytta lítið og gera lítlan mun, og tí hevur sjálvsstýrisflokkurin mælt til, at farið verður til verka við hesum uppgávum á ein heilt annan hátt og nógv meiri grundleggjandi.

Sjálvsstýrisflokkurin ætlar, at hesi uppskot skulu skundast fíggjøgnum, uttan at grundir eru at viðgera tey til fulnar. Sannleikin tykist tíverri at vera tann, at hesi, sum nava smíðað hesar lógir, sum nú skulu trýstast fíggjøgnum, og bert raka summi, ikki kenna tíl svára neyðina, sum borgararnir eru í, og hvussu rungt ein vanlig familja hevur við at fáa endarnar at rokka saman.

Tað, sum samgongan við hesum uppskotum rør uppundir, er, at allir føroyingar skulu gerast lógloysingar. Tað skal ikki vera lønandi at fortvinna sær gening í Føroyum. Kósina móti svarta arbeiðsmarknaðinum hevur samgongan sjálv sett.

Sjálvstýrisflokkurin er greiður yvir, at hetta, sum nú hendir, er einki minni enn trælahald - umráðandi tykist tað at vera at skifa um munin millum rík og fátæk í okkara samfelag, og eingin kann siga føroyingin ringan fyri at mótmæla - reisast og slíta trælalænkjunar.

Út frá hesum eatir minnilutin fram soljóðandi

U p p á s k r i f t

til

<u>lagafrumvarps um breytingu á fjáraflalagafrumvarpinu um eyðublöð til fjárkvittana.</u>

Í lagafrumvarpi nr. 10 frá 31. mars 1989: Fjáraflalagafrumvarp fyrir árið 1. janúar - 31. desember 1989 verða gerðar hessar breytingar:

1) Í §§ 10, 11, 12, 13, 14, 15, 17, 18, 19, 20 og 23 verða minkaðar úr 140.000 mið. kr.

2) Undir § 16: <u>Fjárkvittunum</u>
verður komið 333017 Hinstalan og annar stuðull til fjárkvittunum hækkað úr ..... 190 mið. kr.

3) Hver áfengisávísunin skal hækkar úr 4,5%.

Greinin verður sett til <u>465 mið. kr.</u>

§ 2.
Henda lög kemur í gildi
dagin eftir, at hon er
kunngjørd.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen Flemming Mikkelsen Sune Jacobsen

Jógvan Dahlsus Heini I. Heinesen Jørgen Thomsen

Lasse Klein

...ETGI 1000 KR

INNTEKTUVOKSTUR: 15,0%

INNTEKTU LOKKAR		SKATTA-PROSENT	MEÐAL-INNTØKA	SKT.-GJALDARAR 1987	SKT.-GJALDARAR ROKNAÐ	INNTØKA FR BÓLK	SAMAN-SPARING PERSÓN	PR. BÓL.
0-	5	0,00%	2,5	5.320	4.626	6.477	0,00	
5-	10	0,00%	7,5	1.605	1.380	14.102	0,00	
10-	15	0,00%	12,5	3.083	1.387	35.805	0,00	
15-	20	0,00%	17,5	3.094	1.878	54.450	0,00	
20-	30	0,00%	25,0	3.149	2.717	95.086	0,00	
30-	40	0,00%	35,0	1.584	2.194	98.726	0,00	
40-	50	0,00%	45,0	1.640	1.690	76.426	0,00	
50-	60	0,00%	55,0	1.457	1.410	91.661	0,00	
60-	70	0,00%	65,0	1.339	1.257	95.022	0,00	
70-	80	0,00%	75,0	1.303	1.211	102.917	0,00	
80-	90	0,00%	85,0	1.205	1.148	109.060	0,00	
90-	100	0,00%	95,0	1.163	1.123	117.901	0,00	
100-	110	0,00%	105,0	1.133	1.064	122.400	0,13	16
110-	120	3,00%	115,0	1.159	1.002	125.272	0,45	45
120-	130	3,00%	125,0	1.127	990	133.615	0,75	74
130-	140	3,00%	135,0	1.110	1.006	145.933	1,05	1.05
140-	150	3,00%	145,0	1.181	990	151.900	1,45	1.42
150-	160	5,00%	155,0	1.094	967	159.505	1,95	1.88
160-	170	5,00%	165,0	1.080	1.012	177.016	2,45	2.47
170-	180	5,00%	175,0	976	982	181.590	2,95	2.89
180-	190	5,00%	185,0	896	946	184.436	3,45	3.26
190-	200	5,00%	195,0	1.757	2.140	454.713	4,38	9.79
200-	225	7,00%	212,5	1.340	1.619	384.461	6,33	10.22
225-	250	7,00%	237,5	834	1.255	339.383	8,08	10.45
250-	275	7,00%	262,5	608	945	271.750	9,83	9.28
275-	300	7,00%	287,5	392	656	205.126	11,58	7.55
300-	325	7,00%	312,5	284	491	165.757	13,33	6.54
325-	350	7,00%	337,5	223	336	121.363	15,08	5.06
350-	375	7,00%	362,5	155	247	95.696	16,83	4.15
375-	400	7,00%	387,5	126	199	82.177	18,58	3.70
400-	425	7,00%	412,5	91	150	65.436	20,33	3.04
425-	450	7,00%	437,5	63	120	55.339	22,08	2.64
450-	475	7,00%	462,5	69	96	46.736	23,83	2.26
475-	500	7,00%	487,5	251	438	306.445	49,03	11.49
500-9999		7,00%	847,5					
				41.611	41.611	4.384.739		110.65
ALLT:								

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN

FØROYA FRAMBURÐS- og FISKIVINNUFLOKKUR

Viðvíkjandi tingmáli 130/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing

Fyri einum mánaði síðani vildi Kristiligi fólkaflokkurin sum ábyrgdarflokkur vera við til at fáa neyðugan pening inn í landskassan. Hetta orsakað av, at okkara høvuðsvinnu, fiskivinnan hevði pening fyri neyðini.

Støða okkara lá var hon, at hesin peningur átti at lænast frá skattgjaldarunum, sum so nøkur ár seinni skuldi fáa peningin aftur við rentu.

Skattgjaldarin sum her varð hugsað um, var hann, sum hevði inntøku omanfyri kr. 300.000.

Á hendan hátt vildu vit fyribyrgja, at vanliga arbeiðsmannalønin kom undir skiparina, og at tey lágløntu soleiðis komu at kenna avlóan av ætlaðu tiltøkunum.

Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin tóku undir við okkum. Støða okkara nú ein mánað seinni er tann sama inntøkumarkinum viðvíkjandi.

Her við harmi má ásannast, at bæði Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava broytt støðu og skjóta upp at lækka inntøkumarkið niður í 110.000 kr.

Hesum kunnu vit ikki undir nøkrum umstøðum taka undir við, ásamandi at slíkt uppskot er vant móti tann minst mentu og beinleiðis familjuføggindarligt.

Í staðin fyri uppskot landsstýrisins um "bundna uppsparing", sum vit eru samdir við fyrrverandi landsstýrismannin í føggjarmálum, er eitki annað enn uppskot um eykaskatt, ið sprengir 50% skattamarkið, seta vit fram niðanfyri nevnda lógaruppskot. Uppskot okkara gevur sambart upplýsingum frá Líkningarstovnum kr. 82 mió. og hevur tað fyrimunir, at

- vit verðveltu 50% skattamarkið,
- skattgjaldarin fær peningin aftur eftir 2 árum við rentu, heldur enn at oiða. til hann verður minst 65 ár,
- lógin fær ikki afturvirkandi gildi sum uppskot landsstýrisins.

Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um samansparing til landskassan.

§ 1. Fyri seinnu helvt av skattaárinum 1989 og fyri skattaárið 1990 verður álagd samansparing til landskassan.
Stk. 2. Skyldu at spara saman hava persónar, sum eru skattskyldugir í hesum skattaári sambært løgtingslóg nr. 36 frá 1. september 1988 við seinni broytingum.
Stk. 3. Samansparingin verður roknað av skattskyldugu inntøkuni, soleiðis sum hendan verður ásett eftir reglunum í galdandi skattalógum, samanber stk. 4 og 5.
Stk. 4. Hendan lóg er galdandi fyri inntøkur frá 1. juli 1989 til 31. december 1990.

Lagtingslov om opsparing til landskassen.

§ 1. For sidste halvdel af skatteåret 1989 og for skatteåret 1990 udskrives opsparing til landskassen.
Stk. 2. Pligt til at opspare pålægges personer, som er skattepligtige i dette skatteår i henhold til lagtingslov nr. 36 af 1. september 1988 med senere ændringer.
Stk. 3. Opsparingen beregnes af den skattepligtige indtægt, således som denne er fastsat efter reglerne i gældende skattelove, jfr. stk. 4 og 5.
Stk. 4. Denne lov er gældende for indkomst fra 1. januar 1989 (skatteåret 1989).

§ 3. Samansparingin verður roknað við 6% av skattskyldugu inntøkuni umanyri 200.000 kr.

§ 4. Eftirhildin fyribilaskattur eftir reglunum í samtíðarskattalógini saman við samansparingini eftir hesi lóg má ikki vera meira enn 60% av tí einstøku útgoldnu A-inntøkuni.
Stk. 2. Í førum, har treatandi skattur eftir reglunum í samtíðarskattalógini er fluttur frá árinum fyri, kann eftirhildin fyribilaskattur eftir reglunum í samtíðarskattalógini saman við samansparingini eftir hesi lóg tó ikki vera meira enn 60% av útgoldnu A-inntøkuni.

§ 5. Landsstýrið fær heimild til at ásetа tær reglur, sum eru neyðugar fyri, at hendа lóg kann verða framd, so sum at ásetа reglur, sum skulu tryggja, at persónar ikki kunnu flyta inntøkur frá tíðarskeiðinum, hendа lóg er galdandi fyri, har persónur doyr, flytir av landinum v.m.

§ 6. Reglurnar í skattlógu-

§ 3. Opsparingen beregnes med 6% af den skattepligtige indtægt over 200.000 kr.

§ 4. Tilbageholdt foreløbig skat ifølge kildeskatteloven sammen med opsparingen ifølge denne lov må ikke overstige 60% af den enkelte udbetalte A-indtægt.
Stk. 2. I de tilfælde, hvor restskat ifølge reglerne i kildeskatteloven er overført fra foregående år, kan tilbageholdt foreløbig skat ifølge kildeskatteloven sammen med opsparingen efter denne lov ikke overstige 60% af udbetalt A-indtægt.

§ 5. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte de for lovens gennemførelse nødvendige regler, herunder at fastsætte regler, som skal sikre, at personer ikke kan overføre indkomst fra det tidsrum, som denne lov er gældende for, såfremt personen er død, er fraflyttet landet o.l.

§ 6. Reglerne i skattelove-

num eru annars galdandi, nar annað ikki er ásett í nesi lóg.

§ 6. Tann samanspardi peningurin verður eftirgoldin einstøku skattagoldarunum saman við tilskrivaðu rentu upp á 5%.

1. stk. Útgjaldingin fer fram býtt javnt yvir eitt 12 mánaðaskeið og byrjar 1. juli 1992.

§ 7. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ne gælder iøvrigt, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

§ 6. Det opsparede beløb tilbagebetales til den enkelte skatteyder tilligemed tilskrevne renter på 5%.

Stk. 2. Udbetalingen fordeles jævnt over en 12 måneders periode, som begynder 1. juli 1992.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Á FØROYA LØGTINGI, 1. juli 1989.

KRISTILIGI FÓLKAFLOKKURIN
FØROYA FRAMBURÐS- og FISKIVINNUFLOKKUR

Tordur Niclasen
Løgtingsmaður

FØROYA LANDSSTÝRI

PR-110 Tórshavn. 29. juni 1989

Tf. 11360. Telex 81310 tanguv fa. Telefax 14942 Postboks 64
Vanlig skrivstovutíð kl. 10—15. Ivaruvrant tíðagt

F. L. nr. 430-12-45-16

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 71/1988: Eykaskattur til landskassan:

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um eykaskatt til landskassan.

§ 1. Fyri skattaárið 1989 verður útskrivaður eykaskattur til landskassan.
Stk. 2. Skyldu at svara eykaskatti hava tey felóg, sum eru skattskyldug í hesum skattaári sambært § 1 nr. 8-15 og tey í § 2 nevndu felóg undir avmarkaðari skattaskyldu, sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinni broytingum.

Lagtingslov om ekstraskat til landskassen.

§ 1. For skatteåret 1989 udskrives ekstraskat til landskassen.
Stk. 2. Pligt til at betale ekstraskat pålægges selskaber, som er skattepligtige i dette skatteår i henhold til lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 med senere ændringer, § 1 nr. 8-15 og for de i § 2 nævnte selskaber under begrænset skattepligt

stk. 1. Skatturin verður lagður á inntektina í til lagsár, sum fellur saman við ella endar í fíggjarárinum 1988.

§ 2. Sykaskatturin verður roknaður við 6% av skattskyldugu inntektini. Reglurnar í § 34, stk. 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 við seinni broytingum eru ikki galdandi fyri hesa lóg.

§ 3. Landsstýrið fer heimild til at áseta tær reglur, sum eru neyðugar fyri, at hendan lóg kann verða framd, so sum at áseta reglur, sum skulu tryggja, at felóg ikki kunnu flyta inntektir frá tíðarskeiðinum, hendan lóg er galdandi fyri.

§ 5. Reglurnar í skattalógunum eru annars galdandi, har annað ikki er ásett í hesi lóg.

§ 6. Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

stk. 1. Grundlaget for skatteansættelsen er det indkomstår, der udløber i eller falder sammen med kalenderåret 1988.

§ 2. Ekstraskatten beregnes med 6% af den skattepligtige indtægt, § 34, stk. 2 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 med senere ændringer gælder ikke for denne lov.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte de for lovens gennemførelse nødvendige regler, herunder at fastsætte regler, som skal sikre, at selskaber ikke kan overføre indkomst fra det tidsrum, som denne lov er gældende for.

§ 5. Reglerne i skattelovene gælder iøvrigt, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Athugasemdir:

Til § 1:

Í hessi grein verður áseta, að lögin er galdandi fyri felog, sum eru skattskyldug í hesum ári, eisini felög, ið eru undir ymarkaðari skattskyldu, koma undir lögina.

Til § 2:

Áseta verður, at § 34, stk. 2 í skattalögini ikki er galdandi fyri hesa lög, og markir hetta, at reglan um 50% hámarkið fyri samlaða inntøkuskattin av skattskyldugu inntøkum, ikki er galdandi fyri sykaskatt eftir hesi lög, men markið verður framvegis galdandi fyri vanliga inntøkuskattin.

Til § 3: Landsstýrið fær heimild til at áseta reglur, sum skulu tryggja, at inntøkur ikki verða fluttar frá tíðarskeiðinum. Lögin er galdandi fyri, t.d. tá at vinnurokandi broyta uppgerðarhátt, tíðspunkt fyri útgjaldingar av lønum verður broytt í mun til undanfarin ár.

Landsstýrið metir, at við hesari lög kemur inn í landskassan o.u. 10 mió. kr.

Landsstýrismaður

Løgtingi Føroya

7

Løgtingsmál nr. 121/1989 (eykating): Eykaskattur til landskassan.

Málið er framlagt av landsstýrinum dann 29. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 30. juni beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tvær minnilutar.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini D. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins viðsandi til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minnilutur (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minnilutur (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen	Flemming Mikkelsen	Sune Jacobsen
Jógvan Durhuus	Heini D. Heinesen	Jørgen Thomsen
	Lasse Klein	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn.

29. juni 1989

F. L. j. nr. 535-1
(at bibhilla i svari)

Tlf. 11080. Telex 81310 tinorm in. Telefax 14942. Postboks 64
Avgreiðslutímir kl. 10—15. Leygardag stongt

JK/EH

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 82/1988: Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

U p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.	Lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlige myndigheders registre.
§ 1.	§ 1.
Í § 9, stk. 2 í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum verður í 4. punktum skoytt uppí aftaná "barnastyrk": "umframt løgtingslóg um bundna uppsparing".	I § 9, stk. 2 i lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre indsættes i 4. punktum efter "børnetilskud": "tilligemed lagtingslov om tvungen opsparing".
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg um evnisskráir kann Líkningarráðið bert brúka P-talið í sambandi við skattamál og í samband við fyrisiting av løgtingslóg um ríkisarvin og barnastyrk.

Landsstýrið metir til, at løgtingslógin um evnisskráir verður broytt, so at Líkningarráðið eisini kann brúka P-talið í samband við fyrisiting av løgtingslóg um bundna uppsparing, sum landsstýrið hevur lagt fyri Føroya Løgting til góðkenningar.

Landsstýrismaður

Løgtingsmál nr. 122/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 30. juni beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluter.

Meirilutin (Svend Aage Ellefsen, Sune Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini O. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins vísandi til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen	Flemming Mikkelsen	Sune Jacobsen
Jógvan Durhuus	Heini O. Heinesen	Jørgen Thomsen
	Lasse Klein	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn 16. mai 1989

TIL: 17080 . Telex NI 210 hinnam fa . Telefax 14942 . Postsvar 64
Kvgreiðslumál: kl. 10-15, bevarross vissi

F. L. : nr.
[illegible]

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr./ÁV/1988: Broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 um eykainnflutningsgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:
1. Sum nýggj § 9 verður sett:
"Landsstýrið fær heimild til við kunngerð at seta nærri reglur fyri endurgjaldi av eykainnflutningsgjaldi til fiskifør og flogfør."

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstra indførselsafgift med senere ændringe.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 om ekstra indførselsafgift med senere ændringer foretagese følgende ændringer:
1. Som ny § 9 indsættes:
"Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for refusion af ekstra indførselsafgift til fiskefartøjer og fly.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Reglurnar um endurgjald av eyka lanfluttningsgjaldinum til fiskifør v.m. verða at seta við kunngerð eftir somu reglum sum reglurnar fyri endurgjald av oljuavgjaldinum eftir løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1996 um serligt gjald á brennibíggju v.m.

Ivan Johannesen
Landsstýrismaður

Á l a t

1

Løgtingsmál nr. 123/1988 (eykating): Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 29. juni 1989 og eftir 1. viðgerð 30. juni beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og tvær minnilutar.

Meirlutin (Svend Aage Ellefsen, Sunc Jacobsen, Pauli Ellefsen, Heini O. Heinesen og Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins viðsandi til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 120/1988 (eykating): Løgtingslóg um bundna uppsparing.

Ein minniluti (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og vísir til viðmerkingar sínar í omanfyrinevnda áliti.

FÍGGJARNEVNDIN, 1. juli 1989.

Svend Aage Ellefsen	Flemming Mikkelsen	Sune Jacobsen
Jógvan Durhuus	Heini O. Heinesen	Jørgen Thomsen
	Lasse Klein	

FØROYA LANDSSTÝRI

FR-110 Tórshavn. 29. juni 1989

F. L. j. nr. 1517-2-3

TF. 11080 . Telex 81310 fmpm fa . Telefax 14943 . Postbox 64
Avgreiðslutíð kl. 10—15, leygardagar stongt

KjH/BH

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 124/1988: (Eykating) Eykastuðul til fiskivinnuna.

Uppskot

til

løgtingslóg um eykastuðul til fiskivinnuna.	lagtingslov om ekstra tilskud til fiskerierhvervet.
§ 1. Játtað verður fiskivinnuni ein eykastuðul í fíggjarárinum 1989 upp til 180 mió. kr.	§ 1. Der bevilges fiskerierhvervet et ekstra tilskud i finansåret 1989 op til 180 mio. kr.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Støðan í okkara fiskivinnu er sera álvarslig, bæði hjá fiskavirkjum og fiskiførum.

Eftir upplýsingum frá Fiskivinnuráðnum hevur hallið hjá fiskiflotanum tey seinastu árini ligið um 100 mió. kr. árliga og væntað verður, at hallið í 1989 verður enn større kanska einar 150 mió. kr.

Seinasta ár var eisini sera vánaligt hjá flakavirkjunum, tey flestu høvdu ov lítið til rentur, og einki kláraði avdráttirnar.

Samanumtikið er fiskivinnan við at steðga upp av hesi stóru gjaldkomnu skuld, hon er komin í.

Fyri at fyribyrgja at fiskivinnan ikki steðgar er bráðneyðugt at lata henni meir pening.

Ætlanin er at nýta umleið 180 mió. kr. afturat í ár til at stuðla fiskivinnuni við gjøgnum ráfiskagrunnin og studningsnevndina, so at fiskaprísirnir kunnu halda núverandi støði.

Játtaðar eru áður á fíggjarlógini fyri 1989 325 mió. kr. til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, og verða játtaðar 180 mió. kr. afturat so er upphæddin til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna í hesum fíggjarári 505 mió. kr.

Annars er ætlanin at virka fyri ymiskum tiltøkum innan fiskivinnuna millum annað:

1) At studningsskipanin verður endurskoða og gjørd einfaldari.
2) Royndir gerast við upphoðssølu.
3) Reglurnar um túralongd broytast.
4) Landað veiða verður goldin eftir dygd.
5) Veiðutrýsti á heimaleiðunum minkast.
6) Upphøggingarstuðulin verður veittur fyrst og fremst út frá veiðuorkuni sum fer úr flotanum.
7) Kannað hvussu svartkjaftatilfanqið best hann nýtast, harí eisini fóðurframleiðsla til alifisk.
8) At fáa gott samstarv millum tað almenna, verandi, og komandi privat fiskasøluvirksemi.
9) At fiskavirkir ganga nýggjar leiðir í framleiðslu, góðsking, skjótleika, samstarv og sølu.

Jógvan I. Olsen
landsstýrismaður

/f. Kjartan Hoydal

Síðumerkingin í bókini er skeiv eingin síða 760 er.

Heini O. Heinesen
Asbjørn Joensen
Poul J. Olsen
Løgtingsmenn

F y r i s p u r n i n g u r

til

Lassa Klein, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-1/88: Viðvíkjandi siglingarmøguleikunum í gjøgnum Haraldssund og Hvannasund.

1. Hvør er grundin, at landsstýrið ikki heldur seg til tær samtyktir, sum eru gjørdar um siglingarrennu í Haraldssundi, samtyktar á landsstýrisfundi 20. mars 1986?

2. Er nøkur kanning gjørd av Hvannasundi, síðani tað var típt fyrí skjótt mongum árum síðani, her hugsi eg serliga um dálkingarvandan og siglingarmøguleikarnar?

Viðmerking til 1:

Í juni mánað eru 4 ár síðani byrjað varð at fylla grót út í Haraldssund í sambandi við aling, varð sagt.

Hetta var í tráð við løgtingsmál nr. 36/1980, pkt. 3, á bls. 227 í Tingtíðindum sama ár.

Hetta mál varð framlagt av undirritaða, ti talan var um at gera grótkast í sambandi við ta aling, ið fór fram í Kunoyarnesi tá. Í staðin fyri at leggja grótkast suður úr Nesinum, varð hildið rættast at byrja upp á byrgingina um Haraldssund.

Nú liggja so tvey alibrúk suðuri í Kunoyarnesi. Um streymurin verður reguleraður við eini siglingarrennu, gevast teir bestu alimøguleikarnir, sum eru í Føroyum. Um rætt verður farið fram, t.v.s. at vit fremja ta samtykt, sum er gjørd í hesum máli, so kunnu vit útbyggja alingína í Haraldssundi munandi við fleiri alibrúkum, bæði sunnanfyri og norðanfyri

byrgingina. Hereftirat kemur, at sundið verður opið fyri sigling aftur, og er hetta nakað, sum er lovað útróðrarmonnum.

Tað skuldi tí ikki verið nakað ivamál at sett hesa samtykt í verk so skjótt sum gjørligt. Hetta kemur at fáa landsbúskaparligan týdning í framtíðini.

26. juni 1985 varð ein nevnd vald av landsstýrinum - hin sokallaða Haraldssundsnevndin. Hvat er vorðið av hesi nevnd? Er hon liðug við arbeiðið sitt?

Viðmerkingar til 2:

Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvussu henda tipping hevur ávirkað umhvørvið í sundinum, og eisini hvussu skilið verður um nøkur ár.

Tað kann ikki vera nakar ivi um, at tað hevur stóran týdning fyri útróðurin, um tað gjørdist siglandi ígjøgnum Hvannasund aftur.

Nú er tað soleiðis, at eingin vil hava streymin aftur í sundið, men tað hevði verið gott, um tað gjørdist møguligt at regulera streymin í sundinum.

Hetta kundi latið seg gjørt, um ein byrging varð gjørd aftrat í sambandi við eitt alibrúk (ella bátahavn).

Á miðjuni skuldi verið eitt portur, sum kundi opnast til sigling og at regulera streymin í sundinum. Eisini skuldu rør verið løgd í botnin báðumegin við, soleiðis at nakað av streymi kundi verið alla tíðina.

Á FØROYA LØGTINGI, 2. september 1988.

Heini O. Heinesen Asbjørn Joensen Poul J. Olsen

Lasse Klein
landsstýrismaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá løgtingsmonnunum Heina O. Heinesen, Asbirni Joensen og Poul J. Olsen í løgtingsmáli nr. 100-1/88: Viðvíkjandi siglingarmøguleikunum ígjøgnum haraldsuns og Hvannasund.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvør er grundin, at landsstýrið ikki heldur seg til tær samtyktir, sum eru gjørdar um siglingarrennu í Haraldssundi, samtyktar á landsstýrisfundi 20. mars 1986?
2. Er nøkur kanning gjørd av Hvannasundi, síðani tað var tipt fyri skjótt mongum árum síðani, her hugsi eg serliga um dálkingarvandan og siglingarmøguleikarnar?

Að 1. Óneyðugar seinkingar hava tikið seg upp í sambandi við samtykt landsstýrisins um gerð av siglingarrennu í Haraldsundi, men ætlan landsstýrisins er, at hetta arbeiði skal í gongd í hesum mánaðinum.

Að 2.

Landsverkfrøðingurin lat gera teoretiskar kanningar av árinum á umhvørvið sunnanfyri byrgingina og vístu tær at negativa árinið var sera avmarkað. Í tíðini aftaná skuldu gerast kanningar á veruleikanum, men eru hesar kanningar enn ikki lidnar.

Á Føroya Løgtingi, 7. september 1988

Lasse Klein
landsstýrismaður

Heini O. Heinesen
løgtingsmaður

F y r i s p u r n i n g u r

til

Lassa Klein, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-2/88: Viðvíkjandi telefonviðurskiftini í Svínoy.

1. Hvussu leingi skulu svínoyingar bíða eftir at hesi ótoleandi viðurskifti verða fingin í rættlag, nær kann væntast, at nakað hendir í hesum máli.

2. Hvør hevur ábyrgdina av tí fíggjarliga missi, sum kann standast av, at telefonin ikki virkar, sum hon skal. Hesin fíggjarligi missur kann verða fleiri ferðir størri, enn tað kostar at fáa telefonviðurskiftini í rættlag.

Viðmerkingar.

Tað eru nú eini 15 til 20 ár síðani, at tað ikki var møguligt at fáa nýggja telefon í Svínoy.

Mær er sagt, at tað standa ikki færri enn 20 í bíðilista í Svínoy, og tey flestu hava bíðað í 15 ár. Hetta má sigast at verða ábyrgdarloysi, so tað forslær.

Eg havi eisini hoyrt, at tann eini svínoyingurin skuldi spyrja stjóran á telefonverkinum, hvat tað kostar at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Tá hann hoyrdi talið, bað hann teir bara gera hetta beinanvegin, hann skuldi gjalda tað sjálvur, um so var, at teir høvdu nakrar krónur. Seinni so kundu teir lata seg fáa nøkur oyru aftur tá.

Hetta kundi heldur ikki lata seg gera.

Á FØROYA LØGTINGI 2. september 1988

Heini O. Heinesen

Suna Jacobsen
Svend Aage Ellefsen
løgtingsmenn

F y r i s p u r n i n g u r

til

Karl Hera Joensen, landsstýrismann

Løgtingsmál nr. 100-3/88 (vetrarting): Viðvíkjandi telefontrupulleikum í Vágum.

1. Nær fáa Vágarnar dupult telefonsamband til Tórshavnar?

2. Nær verður útvarps- og sjónvarpssendinetið útbygt soleiðis, at Gásadalur og lutvíst Mykines kunnu síggja og hoyra elektroniska fjølmiðlarnar?

Viðmerkingar.

Fyrri spurningurin varð reistur á tingi av Vága tingmonnunum í 1985. Í december 1985 svaraði táverandi landsstýrismaður í telefonmálum, Lassi Klein, Vága tingmonnum, at fyri at sleppa undan, at størri bygdir og landspartar í Føroyum liggja uttan telefon, eru lidnar ætlanir um í komandi tíð at gera dupult samband so skjótt, sum íløgufíggjarætlanir verða góðtiknar av landsstýri og løgtingi.

Nú eru fleiri ár frálíðin, og einki rørist fyri duplulta sambandinum. Eisini hevur Felagskommunan í Vágum í skrivi 21. mars 1986 hesa áheitan á Telefonverk Føroya Løgtings:

1. At bera so í bandi, at hóast slit er á kaðalinum til Havnar, skal tað framvegis bera til at ringja innanbíggja í Vágum.
2. Dupult samband í millum Vágoynna og Havnina verður gjørt so skjótt, sum til ber.

Telefonverkið sigur í svarskrivinum, at stórar íløgur

krevjast at gera tað møguligt at ringja innanbíggja óheft av sambandinum til Havnar. Tí er rætta loysnin, at Vágoyggin fær eitt samband aftrat tí verandi.

Støðan er bara versnað, síðani hesar áheitanir og fyrispurningar vórðu settir fram. Verandi vidurskifti eru ótolandi, og hetta mál snýr seg í fyrstu syftu bert um dupult samband í millum Velbastað og Tórshavn. Tí loyva vit okkum at seta spurning í fram.

Til spurning 2 skuldi ikki verið neyðugt við prógvførslum. Gásadalur hvørki hoyrir ella sær fjølmiðlarnar, meðan Mykines nevur vánaliga hoyrilíkindi á FM.

Á FØROYA LØGTINGI, 8. mars 1989.

Sune Jacobsen

Svend Aage Ellefsen

Karl Heri Joensen
landsstýrismaður

S v a r

uppá

fyrispurning frá løgtingsmonnunum Svend Aage Ellefsen og Suna Jacobsen í tingmáli nr. 100-3/1989: Viðvíkjandi telefontrupulleikum í Vágum.

Spurningarnir eru soljóðandi:

1. Nær fáa Vágarnar dupult telefonsamband til Tórshavnar?

2. Nær verður útvarps- og sjónvarpssendinetið útbygt soleiðis, at Cásadalur og lutvist Mykines kunnu siggja og hoyra elektronisku fjølmiðlarnar?

Hesir spurningar hava fyrr verið reistir á løgtingi, og svarið hesaferð verður ikki ólíkt tí aftursvari, ið varð givið í 1986 og 1988.

Ad 1: Teir, ið spyrja, siga í sínum viðmerkingum, at støðan er bara versnað. Sambært teim upplýsingum, landsstýrið hevur fingið frá telefonverkinum, er hetta ikki beint, tí sambandið við Vágoynna er vælvirkandi, men verður gjørt enn betur við einum sambandi aftrat eins og til aðrar partar av landinum, ið eru eins fyri og Vágoyggin.

Nú er tað ikki nakað ókent fyribrigdi, at telefonverkið hevur elorku fyri neyðini, og tað er heldur ikki ókent, at elnetið er sera viðkvæmt á vetrardegi. Hóast hesar fortreytir, tykist telefonin at vera lítið nervað av veðrinum, tí telefonverkið hevur gjørt stórar íløgur í neyðstreymsveitingar, eisini í Vágunum, har eitt elverk stendur inni á støðini í Miðvági, men á minni støðum, radiostøðum og í kaðalhúsum er álitið akkumulatorar, ið eru ein hjálp, tá ið stytri streymslit eru, men dregur tíðin út við ongari elveiting, verða alt fleiri og fleiri rakt av telefonsliti eisini.

Sum áður upplýst, verður eitt radiosamband gjørt aftrat til Vágoynna. Hetta er tikið við í góðkendum verka- og fíggjarætlanum hjá telefonverkinum fyri tíðarskeiðið 1986 - 1991. Telefonverkið hevur søkt um byggiloyvi til 30 m høga antennumastur í Miðvági at nýta til hetta eykasamband, eins og nýggj radioútgerð til sama samband kemur í summar, og arbeiðið væntast liðugt um ársskiftið 1989/90.

Ad 2. Í uppskoti til íløguætlan fyri sendinetið hjá Sjónvarpi Føroya, sum landsstýrið hevur til viðgerðar, eru 6 umsetarastøðir, sum setast skulu upp, fyri at geva øllum íbúgvunum í landinum møguleika fyri at siggja Sjónvarp Føroya.

Um henda íløguætlan verður samtykt, fer tað at taka umleið eitt ár, áðrenn umsetarastøðirnar kunnu takast í nýtslu vegna leveringstíð og uppsetingararbeiði v.m.

Á Føroya Løgtingi, 30. mars 1989

Karl Heri Joensen

Farloyvi

29. juli varð við 29-0 atkvøðum samtykt at Ingrið Sondum, Jona Henriksen og Juul Jacobsen taka sætið á tingi fyri Karin Kjølbro, Jóannes Dalsgaard og Tord J. Niclasen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

6. september 1988 varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Martin Nielsen tekur sætið á tingi fyri Svend Aage Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

15. desember 1988 varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge tekur sætið á tingi fyri Óli Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

18. januar 1989 varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at Kári Kjelnæs tekur sætið á tingi fyri Niels Paula Danielsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

10. februar 1989 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Heðin Mortensen tekur sætið á tingi fyri Paula Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

23. februar 1989 varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Eyðun Videro tekur sætið á tingi fyri John Petersen, sum í skrivi bað um farloyvi.

10. mars 1989 varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at Hans Jacob Debes tekur sætið á tingi fyri Karin Kjølbro, sum í skrivi bað um farloyvi.

21. mars 1989 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Ernst Kass, Magni Arge, Eliesar Arge og Erna Háberg taka sætið á tingi fyri Tórbjørn Poulsen, Jóngerð Purkhús, Óla Breckmann og Poul Michelsen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

5. apríl 1989 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Jákup Mikkelsen og Øssur av Steinum taka sætið á tingi fyri Anfinn Kallsberg og Jógvan Durhuus, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

19. april 1989 varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Hilmar Bech, Jóannes Dalsgaard og Eliesar Arge taka sætið á tingi fyri Henrik


Old. Jákup Lindenskov og Óla Breckmann, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

22. juni 1989 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Dan Nielsen og Hilmar Bech taka sæti á tingi fyri Hergeir Nielsen og Atla P. Dam, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

29. juni 1989 varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at Jákup Mikkelsen og Christian Fr. Olsen taka sæti á tingi fyri Anfinn Kallsberg og Jógvan við Keldu, sum í skrivi bóðu um farloyvi.


30. juni 1989 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Terji Jacobsen og Hanus Lassen taka sæti á tingi fyri Flemming Mikkelsen og Christian Fr. Olsen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22



svartkjaftaskipini, sum í dag mær vitandi øll liggja inni á Skálafjørðinum sum liðug bæði so og so og summi í hálvum gekki. Grundgeving løgmans er, at so nógvir privatir eru útbløddir í hesi vinnu. Ikki minst at takka Føroya Landsstýri, er almenninginum orðið kunnugt, at menn hava mist hópin av privatum peningi og hanga upp á ovurstóra persónliga skuld í samband við, at farmaskipini eru koyrd á húsagang. Eigararnir á Global- skipunum hanga upp á fleiri ferðir 10 mió.kr., er komið alment fram. Eg fari at biða løgmann um at taka fram tey svartkjaftaskipini, sum í dag liggja inni á Skálafjørðinum, skip fyri skip og greiða Føroya løgtingi eitt sindur nærri frá, hvørjir privatmenn eru útbløddir av hesum skipum, og hvussu teir eru blivnir útbløddir.

Er tað ikki so, at her hevur landskassin júst havt hol í botni og leyst lok, sum løgmaður tekur til í endanum av løgmansrøðuni.

Undir viðgerðini av undirgrundini sigur løgmaður frá, at samgongan nú, hon hevur sitið í 4 ár, hevur roynt at brynja seg til enn eitt samráðingarumfar við donsku stjórnina um yvirtøku av undirgrundini.

Tekur ein Sosialin fram frá fyri 4 árum síðani, so stendur at lesa við ovurstórum bókstavum, at Javnaðarflokkurin longu tá hevði loyst spurningin um undirgrundina. Tað var persónligi vinskapurin millum Anker Jørgensen og Atli Dam, sum hevði tryggjað okkum eina endaliga loysn upp á henda spurningin. Stórt avrit ella foto av persónligum brævi til Atla var avmyndað í Sosialinum.

Í dag 4 ár seinni aftan á, at hesin maður sjálvur hevur havt leiðsluna, so fyrireikar løgmaður seg til at samráðast um eitt fyrsta stig til loysn av hesum spurninginum. Vónandi hyldnast summi úrslit av persónliga vinskapi løgmans betri enn onnur. Tey dømi, eg her havi nevnt, standa svart upp á hvítt í sjálvari frágreiðing løgmans til Føroya løgtings.

Seinni, á blaðsiðu 1 viðger løgmaður gongdina í uttanlandsskuldini. Hann fegnast um, at henda bert er økt við 1500 mió.kr. Hann gloymir at siga frá, at talan er um kursbroytingar, sum er greitt nærri frá í áðni og talan er um ekstraordinerar inntøkur orsakað av sølu av føroyskum framleiðsluttólum, sum aðrir reka og vinna pening upp á í dag.

Veruleikin er, at samanborið við undanfarna valskeið, er uttanlandsskuldin økt við upp í

móti 2500 mió.kr., men er kunstiga minkað við at slakta 100 tals føroysk arbeiðspláss, sum góvu og sum framhaldandi høvdu givið positiva bruttofaktorinntøku til okkara samfelag. Her til kemur so tann nevnda kursbroytingin. Henda lántøkan uttanlands upp á ikki 1500 mió.kr., men 2500 mió.kr hevur sjálvandi skapt eina ósunna búskaparliga gongd í Føroyum her undir skapt ein stóran kunstigan likviditet fyrst og fremst í landskassanum.

Um eitt privat húsarhald við hampiligari inntøku og tað høvdu Føroyar fyri 4 árum síðan haraftrat lænir hópin av peningi til nýtslu, so er sjálvandi talan um góðalív í hesum húsarhaldinum, væl at merkja inn til skuldin skal gjaldast aftur. Veruleikin er eisini og átti løgmaður at viðmerkt, at vóru uppskot sambandsfloksins á løgtingi og í figgarnevnd samtykt, so var uttanlandsskuld Føroya hesi seinastu árini ikki økt við 1500 mió.kr., men heldur minkað tey seinastu 4 árini, hetta kann skjalprógvast. Sjálvt um, løgmaður ikki segði ósatt við vilja, hvussu skuldi hann grundgivið eina búskaparliga framgongd fyri tað føroyska samfelagið. Hvørjum skuldi henda framgongd stava frá? Hvørji búskaparlig tiltøk hevur hetta landsstýrið tikið stig til, sum kunnu hava styrkt um føroyska búskapin? Í fyriliggjandi løgmansrøðu finnur tú ikki eitt tað einasta eitt og tey eru tíverri ikki til, eisini hesum gevur løgmaður mær rætt í upp á prent. Hann vísir nevnliga á, at okkara útflutningur, bruttoinntøkan hjá tí føroyska samfelagnum ikki er øktur við meira enn umleið 75 mió.kr. árliga. Hann viðgongur, at bruttoinntøkan hjá tí føroyska samfelagnum stórt sæð hevur staðið í stað. Hetta sigur løgmaður sjálvur samstundis, sum hann kærir seg um at hava mist tamarhaldið á gongdini innan íløgurnar í okkara samfelag, og hann hevur rætt. Hetta landsstýrið ella kanska rættari sagt Føroya løgmaður hevur stilað fyri nýíløgum í okkara fiskiflota upp á 2 milliardir kr.. Samstundist staðfesta vit, at bruttoinntøkan stendur í stað.

Her koma vit til sjálva kjarnina ella annan av høvuðstrupulleikunum í okkara samfelag aftaná, at Føroya Javnaðarflokkur og Tjóveldisflokkurin aftur eru slopnir at hóreiggja í stýri landsins, nevnliga, at samlaða inntjeningin hjá føroyska

samfelagnum hevur verið og er í stórari minking, inntjeningin uttanífrá.

Einum nýtist ikki fantasi fyri at fyristilla sær, at tá bruttosølan stendur í stað ella minkar, samstundis sum íløgur upp á meira enn 2½ milliard verða í høvuðsvinnuna, tá minkar inntjeningin í stórum, men løgmaður ikki so mikið sum nevnir henda álvarsliga spurning.

Tey hagtøl, sum umsitingin hevur latið frá sær tey seinastu árini, prógva annars eisini til fulnar, at hetta tíverri er gongdin. Fiskiveiða, fyrsta framleiðsla á landi og sjóvinna, tað er staðið í stað ella minkað, meðan alt annað er økt í hesum samfelagnum. Hinvegin sigur løgmaður, at tað er rættiliga vist, at støðan batnar út á heystið 1988, hetta stendur í løgmansrøðuni. Sami løgmaður, sum fyri 4 árum síðani skuldi loysa allar kendar og ókendar trupulleikar eftir 500 døgum. Og løgmaður viðgongur so sanniliga eisini skrivliga, at hann ikki rættuliga trýr upp á tað, sum hann sjálvur skrivar nevnliga, at tað er rættiliga vist, at støðan fer at batna, tí hann sigur beinleiðis upp á prent, at henda væntaða framgongdin er ein fuglur á tekjuni.

Hin trupulleikin, sum sitandi landsstýri og samgonga saman við hinari heltini av andstøðuni hava skapt í okkara samtfelag, er fyrireikingin til og tilrættaleggingin av einum ovurstórum vøkstri innan almennu óproduktivu útreiðslurnar.

Í 1987 fevndi løgtingsfíggjarlógin um eini 130 nýggj størv innan fyri tað almenna. Og eg havi ikki talið fyri 1988, men har eru nógv. Blokkstuðulsskipanin og fyrireikaði struktururin innan almennu umsitingina kann bert føra til enn fleiri almenn størv og til vaksandi almennar útreiðslur á øllum økjum.

Vit í Sambandsflokkinum hava fyrr nevnliga í 1981 staðið yvir fyri tilsvarandi, men munandi minni trupulleikum. Vit fingu til uppgávu, at fáa yvurtøkurnar frá sjeyti árunum til at virka í praksis, men megnaðu at gera tað uttan væntaða vøksturin í almennu útreiðslunum. Uppgávan aftan á komandi val verður nógv torførari.

Harra formaður. Eg haldi meg hava hildið lyftið um, á ein sakligan hátt at viðgera fyriliggjandi løgmansrøðu sum eina politiska røðu sum eina frágreiðing til Føroya Løgting Eg haldi meg hava víst á, at henda løgmansrøðan kanska sum eitt føroyskt eindømi hevur avdúkað sitandi samgongu undir Javnaðarflokkinum, floksins

leiðslu og fyri so vítt eisini leiðaranum av andstøðuni sum grundleggjandi politiskt óálítandi. Ikki so nógv tað, at henda røðan sjálv ikki hongur saman, at innihald og samantak ikki samsvara á nakran hátt, men meira tað, at røðan heilt og aldeilis avdúkar, hvussu Føroya Javnaðarflokkur saman við sínum samgonguflokkum hevur drigið føroyska veljaran upp á tráð í einum og øllum.

Harra formaður. Í røðu síni sigur løgmaður, at samgongan gongur óskammað fram fyri dóm veljarans. Vónandi fellur veljarin hesaferð ein rættvísan dóm til fyrimunar fyri Føroyar.

Adolf V. Hansen (fr.)

Harra formaður.

So skulu vit undir tað seinastu formansrøðuna í hesum valskeiði, og hetta er so einasta frágreiðing frá løgmanni, ið okkara annars ungi flokkur hevur verið við til at ávirka. Flokkurin er sum kunnugt stovnaður í november 1986 og tað er mark fyri, hvat vit hava kunnað útint, men eg hugsi, at tað er kanska ikki so lítið, tá ið avtornar.

Framsóknarflokkurin er ein ungur flokkur, men hóast ungur bert hálvt annað ára gamal so tordi hann at taka tá stóru ábyrgd at verða við í landsins stýri, tá ið tað leikaði so hart á, sum tað gjørdi. Fyrsta bragdið, Framsóknarflokkurin gjørdi ella rættari sagt síðsta bragdið, Framsóknarflokkurin gjørdi sum andstøðuflokkur og sum samstundis varð tað fyrsta bragdið sum samgonguflokkur, var at fyribeina teimum vandafullu broytingum, sum vóru lagdar fyri tingi í broytingar í donsku straffilógini. Vit eru sjálvandi samgonguni takksamir fyri, at teir vildu hjálpa okkum næstan øll, ið hvussu er.

Næsta bragdið, ið flokkurin fekk framt, tað var, tá hann hevði verið eina viku í samgonguni, tá foraði hann fyri einum falli av studninginum til fiskaprísirnar uppá 5%, sum svarar til eini 40-50 oyru fyri kilo.

Triða stórsigurin hevði flokkurin tann 1. juni, tá tað eydnaðis at forða einum falli í fiskaprísinum upp á heili 14%, sum svarar til nærum hálva aðru kr. fyri kilo, og eg kann her lova fyri, so leingi Framsóknarflokkurin hevur umboð í landsins stýri, fer hann ongantíð at loyva, at fiski og útróðrarmaðurin aftur verður brúktur sum harmonika í prissysteminum.

Famsóknarflokkurin legði seg ikki at sova á teimum varðveittu fiskaprisunum og brúkti teir

sum høvdapútu, vit stríddust víðarí og val stuðlaðir av hinum samgonguflokkunum eydnaðist tað tann 11. juli í ár at fáa fiskaprísirnar uppeftir við ikki færri enn 6,5% tað svarar væl til eini 50-60 oyru kyri kg. Eg vil nýta høvi til at siga, at hesa seinastu hækkingina kanska tað eru serstakliga tveir persónar í Framsóknarflokkinum, vit kunnu takka fyri, tað eru nevnliga A. Djurhuus og Bjarna Vestergaard.

Sum heild kann sigast, at fiskaprísirnir liggja í dag 25,5% hægri enn, teir vildu gjørt, um Framsóknarflokkurin ikki fór upp í landsstýrissamarbeiðið, tá tað í vár mundi eydnast Fólkaflokkinum at fáa útskrivað nýval, sum teir høvdu planlagt saman við tí flokki, sum stakk halan millum beinini, tá harðast stóð á viðvíkjandi etiskum og virnuligum spurningum. Tað kundi verið áhugavert at spurt, hvør ið er tann kvinna ella, hvør ið er tann maður, sum í dag av einum reinum hjarta kann koma fram og siga, at betur hevði verðið, um val hevði verið í summar við teirri fylgju, at skip, bátar, fiskimenn og útróðrarmenn høvdu fingið ein fiskapris, sum lág 25,5% lægri enn, hann ger í dag. Eg kundi hugsað mær at spurt, um viðkomandi hevði torað at staðið fram og sagt, at betur var eitt val í úrtið vælvitandi at so hevði onki arbeiði verið á flakavirkjunum, tí skip og bátar høvdu havt ráð at lagt frá landi, um fiskaprísurin var ein fjórðing lægri ella gott og væl tað.

Ein freistast at spyrja, hvat bankar og sparikassar siga til, at vinnan verð hildin gangandi við at halda fiskaprísirnar 25,5% hægri enn, teir vildu verðið, um tað hevði eydnast teimum 8 fólkafloksmonnunum at framprovikera eitt lemjandi væl í ótíð. Hvat sigur handilstandurin hvat siga hondverkarar? Hvat siga heilsølurnar? Hvat siga bilhandlarar? Hvat siga framleiðarar? Hvat siga húsabyggjarar og tít, sum skulu setast í búgv? Hvussu nógv mundi verðiði tykkara part og hvussu hevði tykkara støða verðið, um fiskaprísirnir høvdu verði 25,5% lægri enn, teir eru í dag. Fólkaflokkurin yndar at pynta seg við teimum fjarðum, at hann verjir tykkum. Men væl hevði verið vart, um tað hevði eydnast hjá honum at fingið hetta valið í úrtið. Væl høvdu tít verið vard, tá tit í dag høvdu staðið við tómum handlum uttan arbeiði og við einum fíggjarligum ruðuleika

oman yvir tykkum. Nei, tit kunna takka Framsóknarflokkinum fyri, at okkara gomlu Føroyar enn hava eitt fyri allar partar gott og poiserandi vinnu- og handilslív. Fólkaflokkurin ynksti í vár eitt væl fyri at pulvirisera teir vinstravallu flokkarnar. Framsóknarflokkurin kundi eisini hugsað sær at minka nógv um teirra atkvøður, men vit brúka ikki ta metodu, sum Fólkaflokkurin ætlaði sær at brúka í vár, tað vilja vit ikki verða við til, tí tað er at spæla við mannalagnur, um Fólkaflokkurin hevði fingið sín vilja í vár, um at fáa val í ótíð, so høvdu Føroyar upplívað sítt størsta fíggjarliga kaos og ein kundi serliga, um ein var Fólkafloksmaður vís tá, at hetta kaos kunnu tít takka teimum vinstrahallu fyri.

Orsøkin til, at Framsóknarflokkurin ikki vildi verða við til hesa pulvurisering av teimum vinstrahallu, var avgjørt ikki kærleiki til hesar vinstrahallu hugsjónirnar, men heilt einføld tann, at tað blivu allar Føroyar, sum blivu fíggjarliga pulvuriseraðar, meðan teir vinstrahallu bert høvdu mist nakrar atkvøður til eitt einstakt løgtingsval. So tann... Fólkaflokkurin sigur, at Framsóknarflokkurin sigur bjargaðu teimum vinstrahallu, so er nakað um snakkið, men vit fóru ikki upp í landsstýrissamgonguna fyri at bjarga nøkrum flokki men fyri at bjarga Føroya landi undan ti fíggjarliga kaos, eitt val í ótíð hevði verðið. At ein so, tá ein bjargar einum samfelag sum heild, ikki fær sílað teir vinstruhallu frá og pulvuriserað teir fyri seg, tað kunnu summi gleðast, um meðan summi harmast.

Bjargingin av teimum vinstrahallu var ikki tilsiktað, men var bert ein fylga av, at Framsóknarflokkurin sum yngsti flokkur á tingi tordi at taka ta ábyrgd, tað er at stýra tá illa stendur til, og eg kann ikki lata vera at nevna eina søgu, sum eg einaferð havi lisið og sum eg havi nevnt her fyrr, um canadiaran, sum átti eina bjørn, og hann hevði tamt hana, so hon fylgdi honum hvar hann fór, og ein dagin, hann var farin út í skógin og lá og hvíldi seg har, tá kom ein fluga og setur seg á pannina á manninum. Bjørnin, sum var góð við mannin, vildi hjálpa honum av við hesa fluguna, so hon ikki skuldi nerva hann, og hon langar sjálvandi labban til fyri at drepa fluguna, men drap eisini mannin. Hetta var eisini tað, ið Fólkaflokkurin vildi gera, teir vildu hava fluguna ta vinstrahallu fluguna vekk av pannuni á

føroyinginum og teir vildu sleppa at knalla labban á pannuna ella á fluguna, sum sat á pannuni og hava harvið knúst alt tað føroyska samfelagið. Tað var tað, Framsóknarflokkurin ikki vildi, og tí fóru vit upp í samgongunað. Vit eru bæði glað og stolt, at vit hava gjørt hesa gerð.

Tað eru onnur økir, sum arbeitt hevur verið á og sum kunnu verða umrødd í her enn bara hesi, sum eru farin aftur um. Vit hava her á landi eitt veiðutrýst, sum er í hægra lagi á okkara fiskastovnar og tað er so ætlanin at gera nakað við hetta. Enn hevur tað ikki eydnast at fingið eina reglugerð fyri tann grunn, ið skal regulera veiðutrýstið at virka, men tað kemur nokk, Rom bleiv ikki bygt upp á ein dag og soleiðis heldur ikki við hesum grunninum, sum skal verða við til at stýra einum góðum veiðitrýsti her á landi. Skulu vit fáa meira burtur úr okkara tilfeingi av fiski, resursir sum eru her um oyggjarnar, so er avgjørt neyðugt at veiðitrýstið verður minka soleiðis at tann fiskur, sum kemur upp á land, er størri, hvør einstakur fiskur er størri, tí hann er bíligari at framleiða og man fær ein hægri prís fyri tað, sum verður eksporterað. Tað hevur stóran týdning, at man fær meira fyri hvørt kilo, tí tað er einasti mátí at fáa javnvá í okkara búskap, tað er við at fáa meira fyri hvørt kilo, og tað fáa vit við at seta niður ta orku, sum skal til fyri at framleiða fiskin og tað kann gerast á fleiri mátar. Vit vita at sølumøguleikarnir eru avmarkaðir. Vit her á landi kunnu kanska ikki gera nógv við marknaðarprísin beinleiðis, men vit kunna har aftur í móti gera nakað við skjølihátti, á hvønn hátt okkara vøra fer av landinum. Eisini á tí økinum er tað grivið úr nýggjum, síðani. Framsóknarflokkurin fór upp í samgonguna.

Nú er tað soleiðis, at verður kongafiskaflak útflutt, áðrenn tað verður fryst, so fæst ein útflutningspremia, eg minnist ikki tølini, eg hugsi tað er 1 kr. fyri kg., um tað verður útflutt sum flak og eg haldi tað er 70 oyru fyri kg, um tað verður útflutt skráskorið og 40 oyru kg, um tað verður útflutt sum rund vøra. Hetta verður gjørt fyri at eggja virkjum, útflytarum og øðrum at brúka sum minst av orku til at framleiða ella til at frysta tað flak, vit hava. Tá ið man hugsar um, nær ein vøra hevur størsta virðið, fiskavirðið, tað hevur hon, tá hon liggur sum

eitt reint flak. Tá hon fer inn í frystaran, so byrjarur hon at minka í virði og eisini kostar tað peníng at innfrysta uttan, at tað gevur nakað serligt arbeiði á landi. Tí verður tað neyðugt, absalut neyðugt at minka um veiðutrýsið á grunnarnar fyri at fáa ein størri fisk sum heild og fyri at minka um útreiðslurnar við at skera fiskin til flak. Hugskotið um at geva ein útflutningsstudning ella eina útflutningspremiu, tað kann so yvirførast á aðrar framleiðslur eisini, tað skal virka sum ein bremsa fyri, at man brúkar frystaríini minst gjørligt, tí tey eru ikki av gagni. Skjótari vit fáa fiskin av landinum, skjótari hava vit eisini fatur á peningínum, bíligari verður hann at framleiða og meira fáa vit fyri hann. Men til alt hetta krevst flutningsfør, tað krevst, at vit hava flutningsmøguleikar og har kann so kanska komast inn á hugskot um at gera ein flogvøll afturat.

Eg skal ikki taka dagar ímillum, um tað er rætt ella tað er skeivtt at gera tað, men eitt er givið, at vit hoyrdu í útvarpinum um dagarnar, at íslendarar nú eru farnir konsekvent yvir til at flyta feskan fisk við flogfari. Tað má væl eisini verða nakað sum vit undir øllum umstøðum kanna. Um tað skal verða úr Vágum ella av Glyvursnesi ella aðeastaðin frá úr landinum, tað hugsi eg at vit skulu yvirlata til framtíðina at gera av. Men tankin má verða at fáa skjótan flutning soleiðis, at vøran, sum verður seld niðrí í stórbýum í Europa, er so fesk, at fólk har niðri gleðast yvir at fáa føroyska fiskavøru.

Føroyski fiskurin hevur altíð verið tann, sum hevur verið best umtóktur næst eftir norðsjóvarfiskin
Norðsjóvarfiskurin hevur nú fingið eitt minni gott orð á seg orsakað av tí dumping, ið hevur verið, tað vil siga, nú er tað Føroyafiskurin, sum nú á marknaðinum eitur at vera tann besti og tí er tað harmiligt, at hann ikki fer av landinum sum feskur, men skorðin til flak, soleiðis at arbeiðið verður verandi í landinum og vit harvið kunna fáa væl meira burturúr.

Eg kundi mett leysliga, at um vit fóru yvir til at flutt sum mest av fiskinum, altíð tá tað bar til, feskan niður á marknaðin og selt hann í sølubúðum runt í Europa, so fingu vit umleið 1 milliard meira fyri okkara útflutníng, enn tað vit fáa í dag. Hartil kemur, at vit á frystiøkinum, um eg so má siga,

kanska høvdu spart nakrar 100 mió.kr. So samanumtikið hevur henda samgongan, sum bara hevur livað í eitt hálvt ár, nú víst á og hevur arbeitt við at finna nýggjar vegir. Eg veit, at ikki bara eg, men allir flokkar í samgonguni harmast í dag, at vit ikki hava eitt 4 ára skeið fyri framman og arbeiða viðarí við hesum tankum, ið vit nú hava arbeitt við, man vildi ynkst at tey 3½ árini, sum samgongan hevði sitið árðenn, hálva vegna vóru klipt burtur úr bara og man kundi hildið fram tey 3 árini, men tað loyvir lógin ikki og tí fara vit upp á val til heystar, men vit fara tað við upplyftari pannu og við góðum treysti, tí vit vita, at Føroya fólk tað vil Føroya landi tað besta.

Tað var Jógvan Sundstein, sum var her og tosaði so niðursetandi um íløgur.

Hann tosaði um svartkjaftaíløgurnar. Tað er púra rætt, at tað er komið síðani valið 1984 hesi svartkjaftaskipini, men eg má minna á og tað verður altíð gloymt at minna á tað, at tað vóru tveir mans í undanfarnu samgongu, sum løgdu eitt sokalla notat fyri Føroya løgting, og tað notatið var eitt notat um, hvussu vit skuldu fáa eina milliard burtur úr svartkjaftinum undir Føroyum. Tað notatið varð sirkulerað runt og menn, sum hava íløguáhuga teir hugdu í hetta notatið og gjørdu sínar ætlanínir og sínar planír út frá hesum notatinum. Út frá hesum notatinum vórðu stovnað feløg tað vórðu gjørdir sáttmálar um stór svartkjaftaskip út frá notati frá Olaf Olsen táverandi landstýrismanni og Paula Ellefsen táverandi løgmanni. Hetta verður gloymt í dag, nú sigur man bara, tað var skeivt at gera íløgurnar, íløgurnar, íløguætlanirnar eru gjørdar áðrenn 1984 og tær vórðu planlagdar av tveimum táverandi landstýrismonnum, nevnliga távernandi løgmanni og Olaf Olsen í 1982, og lagdar fyri tingi her. Tær ætlanirnar eiga æruna av hesum, og tí haldi eg, at tað er harmiligt, at man nú hevur latið hesi skip av hondum, kanska ikki øll, men tað er líka við, at øll eru farin úr hondum og tað haldi eg er harmiligt, tí eg persónliga síggi stórar møguleikar innan fyri svartkjaftavinnuna. Tað verður ikki tíð at koma inn upp á tað nú, men eg skal seinni í hesari løgmansrøðuni, um eg fái orið aftur koma inn upp á tað.

Eg skal enda við at siga, at tað er ikki bert á

vinnuliga økinum, at Framsóknarflokkurin hevur verið samfelagnum til stórt gagn hetta hálva árið, men eisini á øðrum økjum, eitt nú á tí sosiala økinum. Har eru stórar landvinningar gjørdar til stórt gagn fyri landið og tað fólk, ið her býr, men teimum landvinningum vil okkara landstýrismaður Karolina Petersen greiða frá.

Sum avslutningur av hesum skal eg loyva mær at gleðast um, at tær ólógligheitir, sum í eini 3 ár hava farið fram á skrívstovu almannaráðharrans hildu, uppat, tá Karolina Petersen tók við.

Tordur Niclasen (kffff.)

Harra formaður.

Sum kunnugt er tað løgmansrøðan 1988, ið er til viðgerðar.

Búskaparstøða landsins er nær tengd at henni.

Uttanlsndaskuldin er sjálvandi tað, sum gongur aftur í hvørjari løgmansrøðu. Hvat sjálvari uttanlandsskuldíni viðvíkjur er vert at hava í huga, at hendan nær um 3 faldaðist í tíðarskeinum 1980-1984 og vóru metingar gjørdar tá, sum søgdu, at uttanlandaskuldin við árslok 1987 fór at verða einar 5-6 mia.kr. Rætt er, tá ið sagt verður í hesi løgmansrøðu, at uttanlandsskuldin uppá 4,6 milliardir fer við árslok 1988 at verða einar 1000-1500 mió.kr. lægri, enn mett varð í 1984. Hóast fegnast verður um hetta, so má alt fyri eitt ásannast, at slík skuld til útheimin, er alt ov stór. Hetta verður eisini óbeinleiðis ásanna í røðu løgmans. Í hesum eisini ein ásannan av, at fíggjar og búskaparpolitikkur ikki hevur eydnast í tann mun, sum ætlað varð.

Hetta havi eg víst á áður, eisini sum sitandi í samgongu, og tí haldi eg tað vera skeivt yvir fyri føroyska fólkinum líka sum at bagatelisera støðuna soleiðis, sum hon í veruleikanum er, og tá líka mikið, hvør situr við stýri. At fíggjar-og búskaparpolitikkur ikki hevur eydnast sum ætlað er serliga komið til sjóndar í tí ovurstóra byggivirkseminum, alhenna serliga, sum verið hevur og sum støðugt ger seg galandi. Avleiðingarnar av hesum hava so verið, at lønarlagið í ávísan mun er farið á glið, og sum so aftur hevur stilla krøv til kapitalstreymin uttanifrá.

Tann daprasta avleiðingin er tó, at fiskivinnan hevur merkt svian av, at so at siga, eingin stýring hevur verið á hesum øki.

Fólkatrot hevur verið á nærum hvørjum flakavirki í landinum og mangt eitt skip hevur havt trupult við at fingið

neyðugt mannskap. Í førum hevur støðan verið beinleiðis vónleys. Fyri at bøta um hesa neyð, hevur verið neyðugt í stóran mun at gjørt brúk av útlendis arbeiðsmegi, og sjálvt um teir 100 tals útlendingarnir hava verið kærkomnir fyri, at tað heila ikki skuldi steðga upp, so má tó ásannast, at føroyska tjóðin er her komin út í eitt síðuspor, sum ongantíð ov skjótt má komast burtur úr aftur. At komið er í hetta spor er bert tíverrí óveikarí politiskari fyri at takka. Heldur henda gongd fram, og tað kann hon bert gera í eitt avmarkað tíðarskeið, ja, so kunnu vit lættliga koma í ta støðu, sum lond rundan um okkum eru komin í, at orsakað av innfluttari arbeiðsmegi fer arbeiðsloysistrupulleíkin at gera seg galdandi tann dag, tá íløgubremsurnar verða táttaðar. Í løgmansrøðuni verður avsanna, at (og eg endurgevi við formansins loyvi) ov stórar íløgur eru høvuðstrupulleikin í føroyska búskapinum, tí er tað eisini neyðugt, at stýring verður sett í verk tíl tess, at viðurskiftini her á landi aftur koma í legu, sum er búskapar-og samfelagslig gagnlig, eina legu, sum er hóskiliga gagnlig fyri føroysku tjóðina og tað fólk, sum her búleikast.

Kapitalstreymurin uttaneftir hevur verið stórur, íløguvirksemið stórt og hevur fiskiidnaðurin sum sagt kent svían av hesum. Hetta er ein dapur staðfesting av einum veruleíka, sum hvørki kann ella eigur at verða fjaldur. Tí tykist, at í so lætt verður farið um hetta, tá sagt verður, at ein avmarking við 300 mió.kr. vil líka sum fáa tingini upp á pláss.

Neyðugt er og verður við neyvarí stýring, og eg havi sagt tað áður og tað kann endurtakast, at megin- reglan átti at verið, at íløgur, sum samfelagsliga tola at bíða eiga at bíða;;;

Her muga lokalpolitisk áhugamál og rossahandlar í politiskum spæli ikki vinna frama. Her má heldur spyrjast, hvat er gagnligt fyrí føroysku tjóðina og fyri tað fólk, sum her búleikast.

Hvat løgmansrøðuni viðvíkur er mangt og hvat, sum trívast kann í til viðmerkingar í samband við almennu fíggarstøðuna verður enn eina fer víst á yvirskot landskassans í hvønn mun landskassin hevur klárað sínar skyldur. Rætt er at frá einum halli uppá 60 mill. í árinum 1984-1985 er vend komin í soleiðis, at yvirskotið fyri 1987 gjørdis 290 mió.kr. umfram góðar 90 mió.kr., sum lagdar vóru í oljugrunnin. Sjálvandi er hesin peningur komin væl við tá hugsað verður um tey veðhaldskrøv, landskassanum hevur verið fyri.

Sagt verður eisini at fyri árið 1988 verður skatta- og tollinntøkan so mikið, at landskassin klárar sínar skyldur og enn tá við einum avlopi. Hetta, at landskassayvirskot hevur verið, hevur fingið mangan at hildið sum so, at so stendur hóast alt ikki so illa til búskaparliga í landi okkara. Hetta er skeiv uppfatan, men tað er væl skiljandi, at mong hava fingið hana, tá hugsað verður um hvussu støðugt henda saman plátan um landskassans yvirskot hevur mælið. Tí her eigur at havast í huga, at eina mest skyldast landskassa yvirskotið, tær inntøkur, sum komnar eru frá, tolli og skatti í samband við tann yvirhitaða búskapin ella yvirupphitaða virksemi, sum verið hevur í landi okkara. Virksemi sum av flest øllum verður mett at verða størsti trupulleikin fyri føroyska búskapin. Stavaði hesin vinningur frá primeri vinnuni so var støðan ein onnur, men tá hann bara ikki, heldur hin vegin stavar frá sokallaðum óproduktivum íløgum.

Harra formaður,
Í hesi røðu løgmans koma orðini, spekulatión, skulka sær undan samfelags skyldum, skákað sær undan skatti o.s.v. ikki sjáldan fyri. Hóast hendan termologiin í at mistonkiliggera borgaran, ikki ókent fyri teir vinstravendu og teir sokallaðu liberalu, so eigur ikki lætt at verða farið um tað sum sagt verður um rentuskattaskipanina á síðu 3. Har verður sagt m.a. Tað hevur vundið

upp á seg, at læna uttanlands til innsetan í føroyskum peningastovnum. Við hesum verður so sipað til, at stórar upphæddir verða læntar uttaneftir upp á lága rentu, settar inn til hægri rentu í Føroyum, og soleiðis beinleiðis verða nýttar við rentuvinningi fyri eygað. Er støðan veruliga hendan, sum sagt verður, ja, so eigur frá politiskari síðu at grípast inn, og ein freistast at spyrja, hví tað ikki er gjørt. Víðari verður sagt í samband við rentuskattaskipanina, at eingin politikari ynskir at skerja uppsparing, men vil framvegis stuðla og premiera slíkari. Hetta úttalilsið er heilt burtur við og sagt móti betri vitandi. Helst verður hesin málburður havdur á lofti, tí nú stendur val fyri durum. Jú, sanniliga eru tað politikarar og heilir flokkar, sum hvørki vilja stuðla ei heldur premiera uppsparing. Ein týðandi táttur í búskapinum er uppsparing, og at uppsparingin í landi okkara er so fræg, sum hon er, skyldast galdandi rentuskattaskipan, og her eigur at havast í huga, at ávísur flokkur fyri ikki so mongum árum síðan, legði uppskot á ting, um at hækka rentuskattin, málið fall tíbetur. Tað spøkti aftur í 1985-1986, men gjørdu vit tá púra greitt, at rentuskatturin skuldi verða óbroyttur, og soleiðis bleiv tað. Tí er tað beinleiðis at kasta Føroya fólki torvmold í eyguni, tá nú sagt verður, at eingin politikari ynskir at skerja uppsparingina.

Fiskivirnan er og verður lívsgrundarlag føroyinga. Umstøðurnar hjá fiskivinnuni hava ikki altíð verið tespiligar, og fiskimaðurin hevur mangan fingið lítið burtur úr fyri strev og strið. Ein ávís upphædd undir heitinum mynstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna hevur verður sett av á løgtingsins fíggjarlóg. Spurningurin um tann sokallaða stuðningin til fiskivinnuna hevur verið nógv umrøddur, og munnu menn flest verða av tí áskoðan, at best var, um henda vinnan klárøði seg uttan umtalaða stuðning. Tó má øllum verða greitt, at er vinnan ikki lønandi, ja so ávirkast hugur og treysti at halda fram hjá teimum, sum á havinum baldrast. Hetta má øllum verða skiljandi, tí er tað neyðugt, at vinnan er lønandi. Málsetningur samgongunnar hevur verið at minka miðvist um henda stuðul við vóníni um, at kombincera varð yvir søluna. Tølini á fíggjarlógini undanfarin ár bera eisini prógv um hetta.

Tó gjørdust øllum greitt stutt undan árslok 1987, at vegna prisføll kom fiskivinnuni at mangla hópin av peningi. Bæði Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið gjørdu avvarðandi politikarum hetta greitt og gjørdist tað tí neyðugt, at játta Ráfiskagrunninum neyðugan pening til tess, at avreiðingaprísirnir komu í rímuliga legu. Eftir uppskoti Fólkafloksins varð sum kunnugt tingið kallað saman til eykasetu, og varð lóg um eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnuni samtykt við 20 atkvøðum fyri, mínari íroknaðari. Hetta var eisini fult í tráð við fundarsamtykt Kristiliga Fólkafloksins nakrar mánaðir frammanundan, har ásannað varð, at neyðugt varð við einari tillagingartíð at hækka stuðulin til fiskivinnuna.

Við fáum orðum verður felagsmarknaðurin havdur á málí í røðu løgmans, har sagt verður, at tað verður lívsneyðugt at fáa avtalu við Felagsmarknaðin um teirra innara marknað, fyri lættari at sleppa fram at markaðinum við viðgjørdum vørum. Eitt at ivast í, at hesi orð løgmans er á rættari leið, tá hugsað verður um, at í 1992 verða stórbroytingar gjørdar innan felagsmarknaðin. Broytingar, sum ávirka innara marknaðin m.a. soleiðis, at tollfrælsi kemur at gera seg galdandi. Tí verður tað neyðugt við nýggjum samráðingum og vónað verður, at hesar verða gagnligar uttan tó, at hava limaskap sum avleiðing. Í 1974 tóku føroyingar støðu til ikki at verða gerast limir í EF. Lítil ivi man verða, at henda støða føroyinga ikki er broytt síðani tá.

Íðnaðarmál fáa eisini rúmd í løgmansrøðuni, her verður m.a. nomið við virksemi Menningargrunsins og man lítil ivi verða um, at hesin grunnur hevur havt stóran týdning fyri íðnaðarmenningina her á landi. Eisini verður nomið við hugtakið kappingarføri og líkasum givin ein resept upp á, hvussu virkir kunnu fáa mest burturúr. Her verður m.a. ásannað, at lønarlagið er avskeplað og er rætt, at júst við avskeplaðum lønarlagi er fortreytin fyri vánaligum kappingarføri til staðar. Aftur eitt tekin um avleiðingarnar av tí ovurhonds upphitaða virkseminum, sum verið hevur her á landi. Síðan soljóðandi

resept, eg endurgevi úr løgmansrøðuni: "Skal virkjum verða lív lagað og skulu tey hava framgongd, so verður neyðugt hjá teimum at bøta munandi um arbeiðsumstøðurnar soleiðis, at talið á arbeiðsfólki verður minst møguligt, og at tey starvandi fáa góðar, tryggar og áhugaverdar arbeiðsumstøður, har teimum verður sýnt álit, sum medvirkandi samstarvsfelagar. Sjálvandi er teimum, íð, starvast á virkjum kring landið untar bestu arbeiðsumstøður. Fari at loyva mær, at spyrja avvarðandi lansstýrismann, um hetta er ein generel uppskrivt ella, um ávís sløg av virkjum verða her havd í huga, har arbeiðsfólki fyri áttu at verið, har arbeiðsumstøðurnar ikki eru áhugaverdar, har teim starvandi ikki verður sýnt álit o.s.f., ella er hettar tann afturvendandi svadan um javnarðarbrøðralag, har starvspolitikkur á arbeiðsplássum skal rekast við luttøku av landsmyndugleikum og yrkisfeløgum.

Í samband við sjóvinnumál eru nakrar reglur skrívaðar. Hetta er ein dapur kapittul í føroysku sjóvinnusøguni. Meginparturin av farmaflotanum er farin undir annað flag. Skipini eru farin og skal enn eina fer ásannast, at hetta verður ein sorgarleikur, ein tjóðskaparligur sorgarleikur, sum eisini hevur rakt einstaklingar kring landið meint. Meginparturin av hesum skipum kom í tíðarskeiðnum 1982-1985, skipini gjørdust ov dýr, raksturin ov tungur, hetta var høvuðsorsøkin til, at skipini komu í trongstøðu.

At marknaðurin fall og harvið inntøkugrundarlagið broyttist, gjørdi tað heldur ikki lættari at fáa endarnar at røkka. "Einki nyttar at gráta um spilta mjølk" sigur orðatakið, men eftir stendur tó, at knúturin kundi kanska verið loystur, um ikki tann eini samgonguflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, alment gav støðu sína til kennar um ikki at bjarga skipunum, áðrenn samgongan sum samgonga var komin til nakra niðurstøðu. Um hetta mundið tók seg eisini skriving upp millum løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum, um hesi somu viðurskifti, so hetta er ikki nøkur avdúking, men bert nevnt til tess at fáa nøkur misskilt ting upp á pláss.

Felagskommunalí stovnurin SEV hevur"øll hesi árini verið "eitt stridens æble". Uppskotið um at steðga SEV á sinni við

ætlaðu útbyggingini fall, men hóast hetta, so hevur hesin stovnir verið eitt kolosalt mótrák fyri úr landsstýrinum, ja, til tíðir heilt ósøguligt.

Spurningurin hevur so mangan verið havdur á lofti, og sum ávísir politikarar hava fingið í hálsin her, at útbyggingin skuldi halda fram í hæddini, tí har fekst mest fyri peningin. Rætt er, at Orkuráðið hevur kúvent í síni meting av, hvar mest fekst burtur úr í mun til íløgu. So stendur eftir, at SEV og rágevari tess ikki eru á einum máli við orkuráðið um hendan spurning. Orkuráðið vísir á, at 40% orka fæst í hæddini upp á 300 m hædd, meðan SEV vísir á, at talan bert er um eina øking uppá 18%, sum er ov dýr at fáa fatur á í mun til tað, sum fæst burturúr. Hóast mótburð, so má ásannast, at SEV átti onkran góðan í landsstýrinum, sum í áhaldni hóast mótburð megnaði at fáa samtyktir framdar, sum góvu SEV heimildir til lántøku, her hugsi eg sjálvandi um fyrrverandi landsstýrismann í kommunumálum Niels Paula Danielsen, sum eisini megnaði at fáa IRF spurningin avkláraðan.

Eitt av hjartamálum Kristiliga Fólkafloksins er, sum øllum kunnugt, familjupolitikkurín, og tí hevur tað ikki verið so løgið, at hesum var givin gott rúm í undanfarnu løgmansrøðu. Í hesi løgmansrøðu havi eg leitað uttan úrslit, men eftir at hava leitað leingi, kom mær til hugs orðini, sum núverandi landsstýriskvinna í almannamálum segði við Sjónvarp Føroya, hon tók til, at hvat familjumálum viðvíkur, er gørt so nógv, at har er lítið og einki eftir at gera. Her vil eg tí nýta høvi at takka fyri skotsmálið, ið Kristiligi Fólkaflokkurin og landsstýrismaður hansara fekk frá avarðandi landsstýriskvinnu. At miðvísur familjupolitikkur var førdur, meðan vit sótu í landsstýrinum, man eingin vera í iva um.

Hvat almannamálum viðvíkur, er meginparturin, sum sagt verður, ein staðfesting av okkara virkna sosialpolitikki, meðan vit sótu í samgongu, sjálvandi við okkara samgongupartnarum, so her skal ikki trívast nógv í. Tó loyvi eg mær at spyrja landsstýriskvinnuna í almannamálum nakrar spurningar. Her verður sagt í løgmansrøðuni, at vardur verkstaður í Klasvík er tikin í nýtslu. Eg loyvi mær at spyrja, hví er hann ikki tikin í nýtslu, hesin vardi verkstaður? Sum kunnugt er

hann ikki tikin í nýtslu. Sagt verður at leiðari er settur við vardan verkstaðnum í Vági, mær vitandi er eingin leiðari, sum situr har, nær verður hesin settur?
Á løgtingsins fíggjarlóg, minnist meg rætt, er peningur avsettur til socialráðgevara í Vági, nær verður hesin settur?
Vardur verkstaður skuldi byggjast í Eysturoynni og var ætlanin, at hesin skuldi liggja við Streymin, hvussu langt er komið áleiðis við hesum tiltaki?
Hvussu gongur við at fáa uppskotið niðan í tingið, um at hækka einkjupensiónina?
Hóast landsstýrið hevur samtykt, at stuðulin til at ansa eldri og óhjálpnum heima eisini skuldi umfata brekað børn, sum búðu heima, so feldi løgtingið uppskot okkara. Eru ætlanir at gera nakrar ábøtur her?

Harra formaður.
Tíðin er við at ganga undan, men eg fari at loyva mær her til seinast at koma inn á spurningar viðvíkjandi javnstøðislógini. Javnstøðislógina verður eisini nomið við og sagt, hóast uppskot landsstýrisins um javnstøðislóg ikki varð samtykt, so fylgir landsstýrið væl við, hvat fyriferst uttan um okkum á javnstøðisøkinum. Tað er væl skiljandi, at heilar tvær reglur eru brúktar í hesum sambandi, tá hugsað verður, at javnstøðislógin hevði principiellan týdning fyri Javnaðarflokkin, ja hon mátti leggjast niðan í tingið, tí at Javnaðarflokkurin ikki mátti sindrast upp á hetta mál, hóast eingin avtala var gjørd í samgonguskjalinum um hetta frammanundan. Eisini er áhugavert at fáa at vita, at landsstýrismaðurin í javnstøðismálum hevur luttikið á javnstøðisráðstevnu í Oslo fyri stuttum. Ja, hvør minnist ikki fagnaðin Vilhelmi varð sýndur, tá hann á pallborðsfundi í Oslo markerðaði Javnaðarfloksins støðu til eina komandi samgongu, at tað nærmast fór at verða treyt fyri samstarvi fyri aðrar flokkar, at javnstøðislóg fer at verða framd. Eisini nýtti hann høvi at siga áhoyrarum í Oslo frá, hvørjar orsøkir gjørdu seg galdandi, at lógin ikki varð framd. Ein av hesum orsøkum segði hann at verða, "på grund af stærke kristne traditioner på Færøerne", tá rungaði látur í høll, og so hoyrdist ikki meir.

Hugstoytt man tað hava verið fyri mangt eitt javnaðarfólk kring landið, at

leggja oyra til táð, sum umboðsmaður teirra serveraði fyri áhoyrarum í Oslo og fyri Føroya fólki. Ein annar av luttakarunum á hesi javnstøðisráðstevnu í Oslo var løgtingskvinnan tjóðveldisfloksins Karin Kjølbro. Komunistablaðið Land og Fólk hevur havt samrøðu við hana, og kemur mangt og hvat fram í hesi samrøðu. Ikki skal verða farið út í æsir, men tó er tað forvitningsligt at siggja, har hon m.a. sigur "Tjóðveldisflokkurin er et venstrefløjparti, som f.eks. mange komunister stemmer på". Annars nemur hon við intern viðurskifti í Tjóðveldisflokkinum, sum ikki eru ókunnug, men sum ikki skal komast inn á her. Um støðu kvinnurnar annars verður sagt "at Karin Kjølbro synest ikke der er sket de store fremskridt for kvinderne i den tid, hun har siddet i lagtinget", hóast hon sigur seg hava verið "myre flittig".

Harra formaður. Til seinast skal eg bert viðmerkja hetta, at tá ið víst verður til framstig, nevnliga, at avlamispensiónin nú ikki verður ávirkað av inntøku hjúnarfelagsins, so er øllum kunnugt hetta, júst hetta, var eitt hjartamál sum Kristiligi Fólkaflokkurin arbeiddi fyri. Harra formaður.

Eg fái orði aftur seinni, og gevist nú, tí tíðin er, sum sagt, farin.

Fundur niðurlagdur kl. 12^{35} uppaftur tikin kl.14^{00} seinnapartin.

???????? (tekniskt brek
????? við bandspælaranum)
?????

<u>Atli Dam</u> (jv.)

Bera á nakra leið, so er talan um at knýta skip aftrat hesum virki, sum kunnu útvega tær neyðugu rávørunøgdirnar burturúr teim kvotum, sum verða settar til at ráða yvir. Tað er fyri so vítt alt, sum gjørt er og tað, sum tí stendur eftir tað er í fyrstu syftu, at landsstýrið heílt formelt fær sær møguleikan fyri at ráða ella virka og handla við hesum aktivum, sum jú formelt eru ogn hjá einum øðrum felag, sum landsstýrið gott nokk hevur partabrøvini í varðveitslu hjá soleiðis, at tað er frítt hjá nýggjum kreftum, tað veri seg landsstýrinum ella saman við privatum at fara inn og keypa tað, sum er eftir fyri tað virðið, sum man nú kann verða

samdur um, inn í eitt nýtt felag. Tað er ein forvitnislig kanning eftir mínum tykki. Serliga forvitnisligt er tað av tveimum orsøkum, tað kundi medvirka til, at man fekk minkað eitt sindur á Føroya-leiðinum, um so var, at nøkur av teimum skipunum, sum vit halda okkum hava ov nógv her, kundi verið knýtt at slíkari støð, og harvið verður at minka um trýstið her.

Og um so var at hetta kundi verið grundarsteinurin undir einum komandi samarbeiði, sum snúði seg um annað enn toskaveiðuna, men sum var gjørt eínki samarbeiði um broytan av øðrum møguleikum í Grønlandi. Men hetta er so á einum fyribils kanningarstigi, so eg kann ikki siga meira.

Hatta er tað, sum stendur á pappírinum. Síðan vóru onkrir spurningar um játtanina til fiskivinnuna. Tað uppskotið er klárt og verður helst lagt fram í morgin, tað er spurt um, nakrar av teim fortreyt, sum løgtingið hevði aftan fyri samtyktina, sum Sundstein skýrir sum eina óavmarkaða heimild, hvat hon ikki var, tí har vóru umrøddar upphæddir upp á 80-120 mill. kr., og um tað er hent nakað við teimum fortreytunum, sum løgtingið legði fyri dagin í tí áliti, sum varð skrivað í samband við heimildina. Tað var ymiskt, sum vit minnast, at samb. lógina skuldu virkir og sølulið í meira mun verða til at bera part av niðurskurðinum. Tað er ikki komið upp á plass, sum øll vita. Tað er tann roynd, sum ráfiskanevndin gjørdi. Hon varð undirkend av kærustovninum og teir arbeiða tí víðari fyri, at finna aðrar skerjingar, sum teir meta eru meira í tráð við intentiónina ella aftan á hjá løgtinginum, og skulu so operera við einum prosenti, niðurgongd ella upp-gongd , frá einum meðalprísi, sum teir skulu semjast um. Eg venti hetta kemur upp á plass innan fyri stutta tíð, men tíverri, hesir báðir nánaðirnir, sum eru gingir, síðan ætlanin var at gjøgnumføra tað, tað hevur kostað eitt lítið sindur. Ein onnur fortreyt, sum eisini var upp til nevndina í Rá-fiskagrunninum at uppfylla, tað var at samtykkja ymiskan studning fyri ávís fiskasløg, alt eftir støddd, og tað sum fremst var talan um var markið fyri upsa frá 55 til 60 cm soleiðis, at upsi undir 60 cm kom undir tann minna prísin og upsi yvir 60 cm á tann hægra prísin, hetta er enn ikki gjøgnumført.

Ein triða fortreyt, sum enn liggur í fiskivinnunevndini, var, at man skuldi royna at fáa ásett hetta dagatalið. Eg vænti, at tað eisini kann fáast ein loysn viðvikjandi tí heilt skjótt. So alt í alt, so meti eg framvegis, at tær fortreytir ella tær avmarkingar, sum eru nevndar í løgmansrøðuni, verða gjøgnumførdar innan fyri stutta tíð og koma at virka fyri restina av hesum árinum.

Tað varð spurt eftir broytingunum til reglugerðina til tær 70 mió.kr. til upphøggingar. Hon er í og fyri seg broytt. Broytingin er samtykt soleiðis, at man í staðin fyri veðskuld, nu opererar við samlaðari skuld og hetta vita umsøkjararnir av, og hava revisorarnir fingið at vita, at tað er ikki formelt lýst, tí tað er ikki altið at reglugerðir verða lýstar, men er ynski um tað, so er einki í vegin fyri at lýsa hetta. Sjálvsagt hesa broytingina sum fyri so vítt er gjørd, og sum er tikin við í viðgerðini av hesum máli.

Síðan varð eisini spurt um serlánskipanina, og har kann eg siga, at eg rokni við, at í næstu viku er nevdin, sum hevur viðgjørt hesar serlánsumsóknirnar liðug við ta seinastu gjøgnumgongdina av teimum umsóknum, sum eru. Teir eru í og fyri seg lidnir, men meta seg hava tørv á einari avpussing, áðrenn hetta fer til landsstýrið og figgjarnevndinataka støðu til. Eg haldi ikki, at eg kann útgreina tað meira, sum spurt varð um, hvar eg byggi tað á, at tað stendur ikki so illa til í vinnuni, sum prestar prædika. Tað stendur bært út har, at tað er ið hvussu so er upplýst mær frá umsitingini, at teir meta ikki hesar serlánsumsóknirnar sum so, soleiðis at støðan er katastrofal í mun til eitt nú í 1979-1980, tá vit høvdu eina serlánsskipan fyrstu fer. Sum tit siggja í fylgiskjølinum til løgmansrøðuna, so eru har, úrslitini hjá teimum flestu skipabólkunum í 1987 frægari, enn tey var í 1986 og 1985, tað eru tey tølini, sum komin eru frá fiskivinnuráðnum. So tað sum manglar, um eg so man siga, í sjálvari metingini, tað er exsakt vitan um støðuna frá 1. januar 1988 og til dagin í dag, og tað kemur so fram.

So eg meti, tað er á góðari leið, at játta hesar 100 mió.kr. sum talan hevur verið um, tað kemur eitt uppskot sum eg segði, annað hvørt í morgin

ella nú veit eg ikki, nær formaðurin vil hava hesi uppskotini. Um hann vil hava tey saman við figgjarlóginí, so man fær ekspedera alt tá ella hann vil hava tey í morgin.

So er ætlanin hjá landsstýrinum at søkja um 40 mió.kr. til Ráfiskagrunnin, 35 miló.kr. til eykagrunnin og 25 mió.kr. til at taka til í samband við stuðul til fiskivinnuna. So eg haldi ikki, eg kann upplýsa meira um hatta, júst í løtuni.

Ein annar konkretur spurningur er málið um, at útvega sjónvarpinum hølir, og tað má eg siga, har er eitt ávist mál, sum er til viðgerðar um einí hús, sum landsstýrið ætlar at keypa, og sum hálva vegna keypssalg var gjørt um.

Tað vísir seg, at tann loysnin kemur at kosta einar 40-50 mió.kr., áðrenn tú hevur eini líkinda sjónvarpshús, so tað má man nokk vurdera eitt lítið sindur nærri, og tað er landsstýrið ið fer við. Men ein hvør loysn kemur óivað at liggja í hasari prísleguni. Tað ger tað í tráð við tað, sum sagt er í røðuni, neyðugt at gera eina ætlan sum so, sum gongur út upp á at um tú keypur eini hús, so er tað harvið ikki givið grønt ljós til at fremja íløgur, sum toga upp í einar 50 mió.kr. so her beinanvegin. Tað má verða ein tíðarætlan, sum er í tráð við tað, sum annars er sagt um hesar íløgurnar sum skal strekkjast.

Jógvan Sundstein eftirlýsti hugsjónum í hesari røðuni, hugsjónir frá einari samlaðari sangongu, sum kundi siga nakað um, hvussu hon ætlar sær at loysa samfelagsmálini framyvir, hvussu hon ætlar sær at stýra framyvir. Men, sum Hergeir Nielsen júst næm við í løtuni, so er eingin gifta avtala aftaná komandi val og tað er einki vitað, hvør ið skal leggja henda politikkin til rættis, hvørjar neyðsemjur skulu gerast, hvørji samfelagsjørn skulu smíðast. So tað vildi verið nokk so nógv av einum smámannavirksemi at sagt frá, hvat, ein so komandi samgonga fór at semjast um. Man kann siga, hvat er neyðugt at gera, og tað haldi eg, man hevur roynt at siga.

Men tað hevurv erið soleiðis í føroyskum politikki, at hvør flokkur særer farin til val. Tað eru ikki samgongur, sum eru farnar til val higartil og aftan á valið, tá man hevur markera sín politik og tær ídeologiir, sum flokkarnir nú byggja á og tað má væl verða tað týdningarmesta tær ideologiir, sum hvør flokkur byggir á.

Tá ið úrslitið av valinum

fyriliggur,verður so samrátt seg til eina hugsjón, um man kan kalla tað so ella eina neyðsemju um, hvat skal galda tey komandi 4 árini; og soleiðis verður tað væl hesuferð eisini.

Tað verður sagt, at ein høvuðstrupulleiki er, at vinnan fær ov lítið burturúr, men tað hevur ongantíð verið soleiðis hjá borgarligum politikarum, at tá ið vinnan fær ov lítið burturúr, so kunnu teir siga, hvat so skal gerast. Aðrastaðni í verðini er tað filosofiin hjá borgarligum flokkum, at tá ið man vinnur ov lítið, so má man taka sær um reiggj, so má man rationalisera, man má finna sær nýggja framleiðslu, man má finna sær nýggj produktir, man má fremja tiltøk, sum gera tað, at man klárar seg á einum frium marknaði. Tað verður ongantíð tosað um tað her heima hjá okkum frá borgarligari síðu tvørturímóti, so løgið sum tað kanska ljóðar.

Tað er bara tað, sum ein ávísur politikari hjá okkum kallar teir vinstrahallu ella tjóðveldissosialistar ella javnaðar/tjóðveldismenninir ella hvat hann nú kallar tað, sum líkasum noyðast at átaka sær at krevja, at eitt ávíst skil er í útviklingini í vinnulívinum. Tí eg haldi, svarið hvørja einastu fer er tað, sum eisini skein í gjøgnum hjá bæði Paula Ellefsen og Jógvan Sundstein í dag, er meira studningur. Tað er tað, sum eg sipið til, tá ið eg tosi um hesa trokanina fram at landskassanum í endanum av røðuni í dag. Tað er akkurát, sum tað er patentloysnin, at landskassin skal útvega tað, sum er ov lítið í vinnuni og eingi krøv skulu setast til vinnuna um rationaliseringar, sum gera tað møgulígt at fáa uttan í frá tann pening, sum skal til renting, avdrátt, kapitalvøkstur og annað tílíkt. Og líkasum fyri at rættvísgera hetta, so sigur man, ja, men øll fiskivinna í øllum heiminum verður subsidierað, hon fær subviðgerð, so hví skulu vit ikki eisini tað. Allar aðrar staðir er tað so, at har er onkustaðni at fara eftir hesum her ískoytinum, men tað er tað ikki hjá okkum.

Tað er eitt land, sum hevur líknandi støðu, sum vit, og tað er Ísland, har er, ið hvussu so er, eingi subsidiir, har eru eingi ískoyti í fiskivinnuni í løtuni. Teir hava verið píska›ir yvir hagar, at teir hava noyðst at taka hesi her subsidiini frá vinnuni, og tað sær út til at ganga. Nú er

tað ein sann roynd, at viðurskiftini hjá íslendingum og okkara hava altíð verið ymisk. Tað er ikki tað sama at reka eitt nú ein feskfiskatrolara, sum í miðal kanska veiðir 2.500 tons og so at reka ein, sum hevur íslandsloyvi, um eg so má siga, og sum kanska hevur eina kvotu upp á 5.000 til 5.500 tons. Har er ein avgerandi munur í fortreytunum, tað má man viðurkenna. Hinvegin sæð, so mugu vit hava tað sum stavnhald at vinna á hesum her muninum og gera okkum sjálvar so førar og so fúsar og dugnaligar, at vit kunnu fáa til vega tann neyðuga peningin. Tí at strukturbroytingar framhaldandi gerast neyðugar, tað má standa fast. Tað krevur so eisini aftur, at í ávísan mun má nakað avviklast av tí, sum ikki kann klára seg.

Ja, Jógvan Sundstein vildi vera við, at tað var líkasum eitt sindur sjálv uppáfunnið. Hetta her við spádómum um útviklingina í búskapargongdini, serliga hvat uttanlandsskuldini viðvíkir og at tað, sum eg byggi upp á, tað er tað, sum eg sjálvur havi væntað og erklerað í valstríðnum í 1984. Tað er nú bara ikki soleiðis.

Um man ger sær tann ómak bara at leggja eina linial á ta kurvu, sum vísti vøksturin í uttanlandsskuldini tey 4 árini frá 1980-1984, so sær man, at tað var ikki 6 milliardir men kanska 8-10 milliardir, sum tann pílurin vísti uppeftir. Men talið 6 milliardir, tað var, so vítt, eg minnist, havt á lofti einafer í eini útvarpssamrøðu av formanninum fyri ráðgevandi nevndina og tá haldi eg, at tað talið føddi fyri tær góðu 6 milliardirnar, sum vit ikki koma upp á nú. So kann man annars eftir mínum tykki spara sær ómakin við at gera ymisk roknistykkir bæði tað, sum eg sjálvur havi gjørt við at siga, hevði nú útflutningurin verið tær 200 mió.kr. hægri, sum hann átti at havt verið, um gongdin hevði verið normal, ja, so var uttanlandsskuldin kanska einar 600-700 mió.kr. minni, enn hon er í dag. Ella høvdu kursbroytingarnar ikki verið tær og tær, so hevði talið eisiní verið eitt annað bæði hjá undanfarnu samgongu og hjá hesari, tí hasar roknингarnar kunnu ikki gjøgnumførast uttan so, at man so samstundis justerar allan útflutningin, t.v.s. at um kursútviklingurin hevði verið ein annar hesi árini, ja,

so hevði prísútviklingin eisini havt verið ein onnur. So hevði krónutalið, sum vit hava fingið sum útflutningsvirði, eisini verið eitt annað.

Eg skal at enda nerta eitt lítið sindur við tað, sum Hergeir Nielsen var inni á um undirgrundarspurningin. Eg veit ikki, um tað skuldi skiljast so, at hann tók sær ávíst tykni av, at eg hevði nevnt, at løgmaður setti ein arbeiðsbólk.

Tað, sum er grundarlagið fyri, at eg skrivi tað á hanða hátt, tað er tað, sum varð framført eisini í samgonguni í undirgrundarnevndini, at við tað at løgmaður persónliga setti henda bólkin, so skuldi hann standa meira óheftur, kunna fara longri, fara til fleiri, fara víðari uttan at vera forpliktaður við at koma sum eitt officielt umboð fyri eina samgongu, sum kanska bleiv bundin av tí, sum teir filosoferaðu um.

Tí ein av uppgávunum var, at teir skuldu filosofera ella fantasera um ávísar praktiskar loysnir, praktiskar avtalur, sum kundu gerast í Danmark, og tey fantasiini koma sjálvsagt til at strekkja seg frá tí minst hugsandi, frá føroyskari síðu til tað mest eftirynskjandi og øvugt viðv. dønum soleiðis, at tað skuldi jú ikki verða vunnið. Men hvar frá hugskotið kom annars, tað skal eg ikki siga nakað um. Fyrstu fer eg hoyrdi um tað, at vit skuldu seta ein arbeiðsbólk sjálvir, tá ið danir ikki vildu verða við, tað var, tá ið samráðingarnevndin gekk tvørtur um slotsplássið í mei mánað 1986, haldi eg tað var, aftan á samráðingarnar, sum jú ikki bóru nakað úrslit við sær tá.

Eg skal ikki spáa um gongdina hesaferð, vit fara at samráðast við danir. Eg vóni, at teir skilja hetta betur í dag at málið er sodnað, soleiðis, at vit kunnu koma víðari, men kunnu vit ikki tað, ja, so mugu vít einaferð aftrat seta okkum niður á føroyskari hálvu og finna lóður og vápn, sum kann bera á mál. Tí eitt stendur fast, at samráðingar koma at geva úrslit.

Eilif Samuelsen (sb)

Harra formaður.

Løgmaður hevur nú hildið sína fjórðu og seinastu løgmansrøðu í hesum valskeiðnum. Talan er ikki um

eina veruliga statusuppgerð yvir skeiðið, men tað framgongur týðuliga, at tað er eitt munandi viknað samfelag. Eitt samfelag, ið er tyngri at reka, ið hann letur yvir til komandi nýggja løgtingið.

Nevnt verður, at virksemið er ov stórt og viðgingið verður, at landsstýrið ikki hevur maktað at gera nakað við tað. Gjaldsjavnahallið er so stórt, sum ongantíð áður.

Uttanlandsskuldin veksur alsamt og er nú komin upp í móti 5 mia.kr. Innflutningurin av vørum frá útlondunum veksur og í hesum sambandið verður nevnt, at vanliga privata nýtslan er vaksin við risalopum. Harafturímóti veksur útflutningurin av føroyskum vørum næstan einki, so tað sigur seg sjálvt, at her kann valla spyrjast nakað gott burtur úr.

Løgmaður sigur í fleiri støðum, at komandi løgtingið og samgongan má fáa skil á viðurskiftunum, tey mugu fáa stýr á íløgunum, tálma virkseminum, tálma nýtsluni, tippa rentuholini, latið verður eisini yvir til eitt komandi ting at fremja, og tað vil siga, at gjalda útbyggingina av havnum, av sjúkrahúsunum og av vinnuskúlunum, av tunnilsbyggingum, ferjulegu við Gomlurætt o.s.fr.

Løgmaður letur frá sær eitt samfelag, sum hann sigur, við trupulleikum og nógvum vandamálum komandi, og at avmarkandi politikurin má fasthaldast og í ávísan mun herðast.

Løgmaður endar røðu sína við at siga, at hann og hansara manning fer ikki til valið at gykla fólki at dansa á rósum, men siga hart og ærliga, at nú noyðast øll at spenna reimina inn, tí onki gildi er ókeypis og roknингin kemur so ella so.

Eg hugsi ikki, at vit nakrantíð áður hava hoyrt løgmann so bersøi viðgingið, at vánaliga stendur til og at framtíðarútlitini eru sera myrk.

Sjálvandi gerð løgmaður hetta við beráddum huga, fyri at taka bráddin av atfinningunum í móti førda politikkinum hjá sitandi landsstýri. Men tað at taka broddin av atfinningum, bøtir jú ikki um tey veruligu vánaligu viðurskiftini. Politikurin hevur sligið feil, framleiðslan, sum skal gjalda alt gildi, stendur nærum í stað.

Løgmaður uggar seg sjálvan og onnur við at siga, at økingin í framleiðsluvirðinum fer at sýna seg um eini 2-3 ár, og hetta sigur hann fyri at tryggja sær, at um tað skuldi

eydnast teimum, sum komu aftan á hetta miseydnaða stýri, at rætta búskapin uppaftur, so skal hann kunna siga,"hvat segði eg slági bara upp í løgmansrøðuni 1988 á síðu 1."

Samstundis sum stígur er komin í vøksturin í landsinntøkunum, so er merglop komið í útreiðslurnar. Hóast tað, at landstýri leingi hevur sæð, at inntøkugrundarlagið hevur svikið, at minni peningur verður at rutta við, so kemur løgmaður at reypa við, at ongantíð áður er so stórur partur av einum samgonguskjali vorðin veruleiki sum hesaferð.

Hvat er tað so í samgonguskjalinum, sum er gjørt til veruleika? Ja, fyrst og fremst hava teir fingið blokkstuðulsskipanina, sum læsir ríkisveitingarnar fastar og í royndu og veru minkar realvirðið á veitingunum ár um ár. Skipanin gav eisini landstýrinum dispositiónsfrælsi, og landsstýrið hevur disponerað síðani.

Figgjarlógin bóg ar upp, rakstrarútreiðslurnar til almannaverkið hækkaðu við næstan 30%, bert í ár og til heilsu og skúlaverkið hækkaðu tær næstan 15%. Løgtingið samtykti upp á fáar dagar í vár íløgur og væl at merkja óproduktivar íløgur uppá 1,5 mia. kr.

Landsstýrið hevur havt eitt loysunarorð, og tað er tað, at teir skulu hækka tænastustøðið. Nú kann tað sjálvandi undir ávísum umstøðum verða upp á sítt pláss, at tað almenna roynir at hækka tænastustøðið á sínum stovnum, men tá ið tað hendir so eigur tað at vera útrykk fyri, at ov mikið er til av pengum, at taka av. Also eitt slag av luksusútreiðslum.

Vit kunna konstatera, at vit hava fingið t.d. eina tyrlu, men tað er ein tyrla aftrat hinari, sum var frammanundan, vit hava fingið eitt flogfar, men tað er aftrat tí, sum vit hava frammanundan vit fáa ein undirsjóvartunnil um Vestmannasund, men tað er aftrat tí sambandinum tí ferjusambandinum, sum var frammanundan og enn tá eitt dupult ferjusamband, vit hava fingið Dúgvuna, men tað er aftrat Tróndi, sum var frammanundan. Vit fáa ein tunnil til Sumbiar, men tað er eisini aftrat tí vegasambandi, var frammanundan og á sama hátt fáa vit eitt til Signabø, men tað er aftrat tí vegasambandinum, sum er frammanundan. Vit fáa ongan tunnil til Gásadals, har sum einki vegasamband er frammanundan. Einki ilt at siga

um summar av hesum íløgunum, tær eru ein neyðug ábót, men tá ið vit samstundis vita, at ein stórur partur av hesum íløgunum eru fingnar frá, at landsstýrið hevur minkað um stuðulin til fiskivinnuna soleiðis, at ein stórur partur av fiskiflotanum liggur í andaleypi og er við at fara av knóranum, so mugu nógv vera samd við Sambandsflokkin í, at her er ikki borið rætt at. Hetta er ein skeivur búskaparpolitikkur.

Vit hava fingið ein landsbanka, ein óneyðugan stovn aftrat, tí hevði búskapardeildin undir landsstýrinum verið nakað meira útbygd, so hevði hon verið før fyri at útint allar tær funktiónirnar, ið neyðugar vóru fyri, at stýra øllum peningastreyminum í Føroyum. Landsstýrið hevur nevnliga frammanundan allar neyðugar heimildir til at regulera kapitalrørslunum við, men landsbankín hevur verið ein sosialistisk merkissøk nú í so nógv ár, at nú sóu teir seg noyddar at fremja málið. Tað hevur sæð út fyri mongum at landsstýrið fyri at samla saman argument fyri at stovna landsbankan hevur latið vera, við at gjørt nýtslu av sínum heimildum til at regulera m.a. lántøku t.d. í gjøgnum kredittfeløgini. Løgmaður skjýtur skyldina upp á aðrar og tosar um, at tiltøk verða undirgingin av einstaklingum og felagskapum, sum misnýta skipanirnar og innanhola allan samfelagsbúskapin.

Um tað er rentuskattaskipanin, hugsað verður um so hevur landsstýrið buktína og báðar endarnar, spurningurin er bara at grípa teymarnar og stýra og eventuelt steðga gongdini. Tað er ikki neyðugt at hava nakran landsbanka til tað, men hetta stýrið hevur í hesum eins og í øðrum førum hildið tað verið mest behagiligt at flyta ábyrdina burt frá landsstýrinum. Løgmaður útrópar tað stóra virksemið, tær ovstóru íløgurnar til at verða høvuðstrupulleikan í føroyskum búskapi í dag. Hetta ljóðar rættiliga løgið, at løgmaður skal gremja seg um tað, eftir sum tað er hann sjálvur, sum seinastu 4 árini hevur sitið við ventilinum í hondini. Hyggja vit á blaðsíðu 22 og frameftir í fylgiskjølunum til løgmansrøðuna so sæst týðuliga, hvar íløgurnar eru farnar, bæði tær privatu og tær almennu. Til tær flestu av hesum íløgunum krevst loyvi frá landsstýrinum frammanundan. Um landsstýrið

hevði stýrt, so hevði tað kunnað regulera íløgurnar, so tær hóskaðu inn í eitt skynsamt búskaparligt mynstur, og tað undrar í allar hægsta grad, at landsstýrið ikki hevur dugað at brúkt tey ella hevur landsstýrið ikki viljað brúkt tey.

Úrslitið avspeglar seg í tí dagliga lívinum, tað er trupult at fáa manning til fiskiflotan. Útlendsk arbeiðskraft er á flestu fiskavirkjunum og byggiplássunum. Ein avleiðing av hesi óvanligu viðurskiftum er, at lønartrýstið veksur og fyri fyrstu fer viðgongur løgmaður, at vit nú á føroyska arbeiðsmarknaðinum mugu konstatera eina, løngliðing, hetta kann fyri framtíðarlønarsamráðingar koma at fáa ómetaligan evgerandi týdning.

Haraftrat kemur, at størsti parturin av íløgunum eru óproduktivar. Hetta prógvar eisini tann veruleikin, at nærum eingin vøkstur er í útflutninginum.

Tað er øllum føroyingum kunnugt, hvørja lagnu tann farmaskipaflotin fekk ið undanfarna landsstýrið stuðlaði uppundir at fáa til vega og sum eitt neyðugt og nærliggjandi alternativ til fiskivirkina. Royndin var váðilig eins og alt slóðbrótandi virki er váðiligt, men við positivum vilja, hjálp og stuðuli er eingin ivi um, at henda vinnan eins og nógvar aðrar her á landi hevði havt gróðralíkindi, um hon bara hevði havt onkran vælgerarvin í hesum landsstýrinum. Hetta landsstýrið rætti ikki hond frá síðu til at veita hjálp, tí fóru øll skipini av landinum.

Løgmaður skrivar í ólavsøkurøðuni við formansins loyvi: Ein stórur partur av farmaskipaflotanum kom í álvarsligar trupulleikar, talan var um nýggjasta partin í flotanum. Hesin partur av flotanum hevði ongan møguleika byggikostnaðurin var alt ov høgur, rakstrarútreiðslurnar vóru alt ov stórar og flutningsinntøkurnar alt ov lágar í mun til íløgurnar og rakstrarútreiðslurnar. Hetta er so satt, sum tað er sagt um farmaskipavinnuna.

Eitt annað stað sigur løgmaður um svartkjaftavinnuna, at tungt hevur verið at fingið svartkjaftavinnuna at mæla, men kortini hava vit ikki ráð at sleppa endanum.

Hetta okkara stórsta tilfeingi skal fáast at geva lønandi vinnu. Tað almenna hevur skyldu at stuðla dyggiliga her, tí so nógvir privatir eru útbløddir í hesi vinnu.

Tá skipini skuldu útvegast vóru nógvir privatir um boðið, og teir, sum sluppu at

fremja íløgur, kendu seg hepnar, men í dag er eins og áræðið linkað, mátturin og peningaorkan ganga undan. Tú kanst so spyrja, hví høvdu vit ráð at sleppa endanum á farmaskipunum? Hví skal svartkjafturin fáast at geva lønandi vinnu og farmasiglingin ikki? Hví hevur tað almenna skyldu at stuðla útbløddum svartkjaftamonnum dyggiliga og ikki farmaskipamonnum? Áræðið er linkað, mátturin og peningaorkan hjá svartkjaftamonnunum ganga undan, segði løgmaður. Man tað sama ikki eisini gera seg galdandi hjá farmaskipamonnunum her er ið hvussu so er, talan um ógvuliga ólíka viðgerð, ella kann tað veruliga vera so galið, at hetta sosialistiska landsstýrið hevur ein so primitivan hugsunaehátt, at tað heldur, at tað almenna hevur skyldu at stuðla svartkjaftaskipunum, sum hetta landsstýrið hevur játtað, meðan farmaskipini máttu rúka, tí undanfarna landsstýrið játtaði tey.

Hetta valskeiðið fer nú skjótt at verða komið at enda. Undanfarna samagonga tók við føroyska samfelagnum í einum vinniligum alduðali. Men tað eydnaðist fram til árslok 1984 at menna og konsolidera samfelagið so væl, at vinnilívið stórt sæð hevur megnað at staðið í móti tí avmergingar virkseminum, sum sitandi samgonga hevur framt. Í 1980 var vinnulívið í kreppu. Summir vilja verða við, at soleiðis er aftur nú. Á kinesiskum verður orið kreppa skriva við tveimum teknum, annað merkir vandi og hitt møguleiki. Tað er nógv, sum týður uppá, at nú er aftur vandi á ferð, men Sambandsflokkurin er eisini aftur í einari nýggjari samgongu fúsur at finna møguleikar ið kunnu føra okkara samfelag burtur úr vandanum og uppaftur á alduskambin.

<u>Svend Aage Ellefsen</u> (ff)

Harra formaður.

Atli Dam løgmaður hann hevur, sum tað longu hevur verið sagt fleiri ferðir, hildið sína seinastu løgmansrøðu í hesum her skeiðnum, og tað kann gott fyri mín part skyld verða sagt beinanvegin, at eg haldi, at hetta her er tann vánaligasta løgmansrøðan, sum sami maður nakrantíð hevur hildið. So vónleysur og fjálturstungin, sum hann tykist at hava verið eftir orðaljóðinum at døma, tá ið hann skrivaði taluna, so er, ið hvussu so er, eitt greitt fyri mær tá eg havi lisið hana ígjøgnum, og tað er hetta, at løgmaður

miriliga angrar og ergrar seg um, at hann nakrantíð skuldi fara út í Tinganes hetta seinasta 4 ára skeiðið, og eg skal forvissa løgmanní um, at tað eru vit fleiri føroyingar enn hann, sum angra og iðra okkum um.

Annars er hetta eftir mínum tykki, ein nokk so keðilig røða, eisini tí ein kennir seg illa at viðgera hana, sum ein slík løgmansrøða hevur uppiborið at verða viðgjørd, tí at hon er full av illgitingum um landsmenn løgmans, um føroyingar yvirhøvur.

Hann sigur, at føroyingar skákað, tað sigur hann á síðu 6 niðast, at tey skáka sær undan skatti og øðrum skyldum. Tey skulka sær undan sínum samfelagsskyldum yvirhøvur, sigur hann longu á síðu 3. Á síðu 1, eg hugsi at tað var 3. stk., har sigur hann, at tey misnýta skipanír, innanhola og forða fyri, at tiltøk, sum verða sett í verk fjøldini ella heildini at frama, skulu eydnast. Soleiðis sigur hann, at vit føroyingar eru. Tað haldi eg er skeivt, tað haldi verða ódámligt av okkara hægsta manni at koma við slíkum skuldsetingum til okkum føroyingar. Eisini er røðan full av sjálvmótsøgnum og leysum pástandum, tó tað, sum fyrst og fremst stendur eftir, tá tú hevur hugt í gjøgnum hesa her seinastu løgmansrøðu Atla Dams, er hetta, at tað er ein vónsvikin løgtingsmeiriluti, sum her leggur frá sær eftir at hava sitið við buktini og báðum endunum nú í 4 ár.

Eg skal her vísa á nøkur dømi um, at soleiðis t.d. sigur Atli Dam, um flakavinnuna, sum ivaleyst er okkara týdningarmesta vinnugrein yvirhøvur, har sigur hann soleiðis, við formansins loyvi: Tað stendur í dag greitt at flakavinnan, rikin so, sum verið hevur, eingi livilíkindi eigur. Hon hevur kunna verið hildin uppi við støðugt økjandi stuðulsveitingum og umfordeilingum, men einaferð steðgar hetta, tí ongastaðni slepst eftir meira stuðningi, vit mugu aftur í eina støðu, har tað, sum krevst til rentur og avdrátt av vinnutólum umframt lønir og kapitaltilvøkstur, fæst uttan ífrá: Also eftir at hava sitið í 4 ár úti í Tinganesi sigur Atli Dam, at í dag stendur tað greitt, at okkara flakvinna eigur eingi livilíkindi frameftir.

Eg haldi, at hetta er av sonnum ein ógvuliga døkk niðurstøða hjá einum stjórnar-

leiðara, sum leggur frá sær. Tað seinasta, sum hann leggur aftrat, er jú meir at meta við tað, sum Gorbatjov í hesum døgum førir fram viðvíkjandi sínum Glasnost Peristroika politikki, hetta her, at man nú fram eftir skal leggja á annan borð. Atli Dam hevur í 3-4 ár havt høvi til at lagt sín politikk til rættis og úrslitið er, at okkara flakavinna ið hvussu so er, ikki eigur livilíkindi frameftir eftir hansara tykki. Annars finst hann, nærmast í illsinni eftir okkum í andstøðuni, tí vit vilja vera við at fiskivinnan er í kreppu, men eg veit ikki, hvat man skal siga. Hann sigur sjálvur, at flakavinnan eigur eingi livilíkindir og um fiskivinnuna, annars harra formaður, skal eg biða um loyvi til at lesa tað, sum hann sigur um fiskivinnuna. Hann sigur soleiðis: Við árslok 1987, vóru vit rættiliga bjartskygd um góðan Noreg Sovjet sáttmála og hann sigur at vit væntaðu tí eisini, at feskfiskaflotin fekk burtur úr hesi øking í sáttmálanum og veiddu feskafiskatrolararnir eisini fyrst í árínum eini 3000 tons eystanfyri, og tað er gott. Síðan sigur hann.

Fiskiskapurin minkaði tó burtur í einki og er hetta eitt álvarsligt afturstig fyri saltfíska og flakatrolararnar. Also flakavinnan eigur eingi livilíkindir, saltfiska-og flakatrolararnir hava verið fyri álvarsligum afturstigi og víðari sigur hann. Á Flemmish Cap er eingin veiða í ár og hava saltfiskalínuskipini tí stórar trupulleikar, enn eitt dømi um, hvussu illa stendur til. Eisini sigur hann: Eisini frystilínubátar hava drigið ov lítið fyrra hálvár. Um laksaveiðuna, laksaveiðan innan fyri 200 fjórðingarmarkið, hon sveik heilt og hesi skip leita nú eftir øðrum møgulekum, ein begdrøviligur standur

á Føroyaleiðunum, sigur hann. Føroyaleiðirnar hava sum nevnt roynst eins drúgvar og seinasta ár. Men har haldi eg, harra formaður, at vit skulu hava í huga hetta, at tað eydnaðist okkum frá Fólkaflokkinum, at fáa samtykt, tá vit sóu hvussu illa stóð til viðvíkjandi okkara feskfiskaflota, so eydnaðist okkum her á Føroya løgtingi ein møguleika til hjá okkara útgerðarmonnum, at fáa lán, tað bleiv játtað av landsstýrinum heimild, at veita upp til 150 mió.kr. í serlánum og vit vita, at tað langt síðan, at ikki færri enn 110 umsóknir vóru komnar um slik serlán, so tað haldi eg má vátta fyri teimum flestu, at har kann ikki standa rættiliga væl til innan fyri hjá okkara feskfiskaskipum.

Men í svartskjaftavinnuni, sum vit høvdu góðar vónir um á Ólavsøku í fjør í samband við at skræðuleyst beinfrítt flak kundi framleiðast og seljast fyri góðan pris, eru vónirnar fjaraðar munandi, og tungt tykist vera at koma víðari, nú tvey skip aftrat eru løgd vegna fíggjartrupulleikar.

Harra formaður.

Eg nevndi á Ólavsøku í fjør, at hetta tosið hjá løgmanni um hetta skræðuleysa flakið, tað hevði lítið upp á seg. Hetta var ein sjónleikur, sum var førdur fram fyrí Føroya fólk í útvarpi og í sjónvarpi, og mæ- vitandi, eru tað tilsamans higartil framleidd 10 tons av bein- og skræðuleysum flaki burturúr svartkjafti. Tað var onkur skilamaður, sum júst segði fyri mær, at tey nú liggja á goymslu norðuri í Klaksvík.

Hetta er ein syrgilig støða harra formaður. Hetta er ein syrgilig støða í okkara svart-kjaftavinnu, sum tað sýntist ið hvussu so er, við endan av undanfarna valskeiði, tað skuldi eydnast at fáa nakað skilagott upp at standa og tað skuldi eydnast at fáa fóta teimum, sum tá fingust vit tað. Men í hesum, sum í so mongum øðrum, eru tað jú onnur viður-skifti enn fiskivinna; her er tað tey politisku viðurskift-ini, sum hava gjørt seg gald-andi. Hendan samgongan legði jú fót fyri tað, sum var, og skuldi sjálv byggja nakað upp, sum teir ivaleyst hava nett, skuldi verða betur, men tað bleiv tað jú ikki. Hetta er tað sum løgmaður sigur um fiskivinnuna, sum eg havi lisið upp við formansins loyvi; og tí er tað nokk so løgið, at hann endar hetta her.

Tað eru politikarar og bløð, sum hava tikið sær rættin til at áseta, at fiskivinnan er í eini djúptgangandi kreppu.

Henda rættin eiga teir ikki og teir fáa hann helður ikki, og hartil er slík tala heilt burtur við. Men hvar eru vit, um vit ikki eru í einari kreppu, tá tað stendur so illa til, sum løgmaður sigur, at okkara flakavinna ikki eigur livilíkindi, at allur okkara floti hevur ringar umstøður ella heilt sera vánaligar umstøður at arbeiða undir. Hann leggur aftrat, at slík tala er heilt burturvið eins burturvið sum trúttanin um, at ávísir samgonguflokkar ganga við duldum ætlanum um at sosialisera veiðuflotan, framleiðsluvirkini ella fiskasøluna.

Eg vil siga løgmanni tað, at um hesir pástandirnir, um at vit, okkara samfelag sum heild eru í eini kreppu, ikki er longur burtur frá hesi trúttanini, sum hann sigur, um at tað eru ávísir samgonguflokkar, sum ætla at sosialisera vinnulívið, so fer hendan sosialiseringin at koma ógvuliga skjótt.

Í endanum á tí, sum hann annars sigur um fiskivinnu, vísir hann á, at ávís tiltøk nú við endan á valskeiðnum eru sett í verk, og tað eru tiltøk, vit jú longu í seinasta valskeiði lutvíst vóru farnir í holt við at fáa upp á standa og alla tíðina hava trýst á fyrí at fingið framt, nevnliga at vaksa um meskaviddirnar og minsta mark av fiski og aðrar avmarkingar, tí at fiskastovnarnir hava jú verið yvirfiskaðir.

Harra formaður

Tað er eingin ivi um tað, at um tað ikki hevði eydnast Fólkaflokkinum at fingið hetta uppskoti um serlánini ígjøgnum og um tað ikki hevði eydnast Fólkaflokkinum at trýst løgtingið saman mitt í summarfrítíðini soleiðis, at vit kundu fáa samtykt ávísar bætar fyri fiskivinnuna, tað endaði jú við, at tað varð eitt uppskot samtykt um at hækka verandi avreiðingarprísir og eisini onnur tiltøk vóru sett í verk, um tiltakið frá Fólkafloksins síðu ikki var komið, so var tað sera illa statt við okkara fiskivinnu, so var tað uppaftur verri statt, enn tað er sambært tað íð løgmaður segði á ólavsøku.

Løgmaður sigur, um íðnaðarmál, við formansins loyvi, at føroyskur íðnaður, handverk og tænastuvirksemi standa meira enn nakrantíð við eitt vegamót. Útlendska kappingin er hørð og tykist at harðna.

Spekulatiónstíðirnar sigur hann, fara at hasa av, men føroyskur íðnaður, handverk og tænastuvirksemi mugu rokna við leingi at koma at kenna avleiðingarnar av eini tíð, við dýrum grundøkjum,

høgum stovningarútreiðslum, dýrum og ótryggum tænastuveitingum, einum sum heild avskeplaðum lønarlagi og tvørrandi arbeiðsmegi. Tað kann verða ringt hjá føroyskum íðnaði, handverki og tænastuvirksemi at fóta sær í hesi støðu. Hatta er tað, sum løgmaður sigur um íðnaðarmál.

Hann vísir annars á við alivinnuni, at tað eru øll tekin til at, útflutningurin av aldum fiski í 1988 kemur at verða minni, enn hann var í 1987. Her vita vit jú, at tað sera óhepna hendi, at alivinnan hevur verið fyri bakkøstum orskað av sjúkum.

Tað er sjálvsagt ikki landsstýrinum at brigda, at sjúkur taka seg upp, men eg hugsi, at vit munnu verða fleiri , sum halda, at landsstýrið kundi havt gjørt nakað fyri at hjálpt teimum, sum fáast við hesa vinnuna. Vit minnast jú, hvussu einstaklingar, teir sum høvdu ábyrgdina av ávísum alibrúkum, noyddust at taka seg saman privat, fyri at útvega sær djóralæknahjálp o.s.fr. úr Noregi fyri at fáa staðfest, hvørjar sjúkur fiskurin leið av soleiðis, at tann rætti heilivágurin kundi fáast.

Tá nú eitt nýtt landsstýri verður skipað aftan á komandi val, tað er sagtanst eingin ivi um, at tað verður, ið hvussu so er, Fólkaflokkurin, sum kemur at hava leiðsluna í tí landsstýrinum, tá mugu vit, okkara flokkur, ið hvussu so er teir, sum tá koma at mynda, tá mugu teir syrgja fyri, at tað verður bøtt munandi um vinnumøguleikarnar, bæði hjá okkara fiskivinnu, hjá okkara íðnaði og hjá okkara alivinnu soleiðis, at tann løgmaður, sum tá kemur at sita, ikki skal tá hann er við at enda sítt valskeið, koma at verða í tí somu støðu, sum Atli Dam tykist at hava verið í, tá hann hevur sett hesa løgmansrøðuna saman.

Annars er nokk so áhugavert at lesa tað, sum løgmaður sigur um sjóvinnumál. Hann sigur soleiðis:"Eg skal setera hann, harra formaður. Hann sigurð. Sjóvinnumál: landsstýrið hevur yngst at seta fulltrúa í landsumsitingina at taka sær av sjóvinnumálum burturav. Nýggja lóg um manning av skipum, havavit fingið, vit hava fingið nýggja sjómansløgtingslóg, vit hava fingið nýggja lóg um sjóvinnu, vit hava fingið nýggja lóg um mynstring av skipum. Eftir hesum lógum skulu vit hava eitt sjóvinnuráð, vit skulu hava eina sjóvinnuumsiting og vit skullu hava ein sjóvinnustjóra, sigur løgmaður. Men í fyrstu atløgu hevur landsstýrið samtykt at seta ein ráðgeva í sjóvinnumálum,

hesin tekur við fyrst í september, tað vil siga, at hann tekur við fyrsta dagin hesin ráðgevin í sjóvinnumálum. Síðani verður sjóvinnuráðið valt, tá ið hetta er gjørt kunnu vit boða IMO frá, at Føroyar hava ratificera S T W sáttmálan, og síðani skulu fleiri kunngerðir setast í gildi við heimild í hesum nevndu lógum.

Harra formaður. Her er nógv nýtt innan fyri sjóvinnu, innan fyri farmasigling, men mær tykist, at tað er bara eitt, sum manglar her, og tað er tað, at her eru ikki longur nøkur farmaskip. Tíðin er farin, harra formaður, tað var keðiligt, tí eg hevði ymiskt, sum eg ætlaði mær at leggja aftrat, men eg fái høvið til at taka eitt umfær aftrat. Takk fyri.

Jørgen Thomsen (jv)

Harra formaður.

Fyrru ferðina, tá ið eg hevði orði tá ætlaði eg eisini at nema við henda her spurningin.

Tað er soleiðis, at Signar Hansen nevndi tað, sum løgmaður skrivar í síni røðu á síðu 3, formaðurin gevur mær loyvi at lesa. Sum fleiri ferðir ávist, er landskassin sera viðbrekin mótvegis spekulatión við rentuskattaskipanini. Búskaparfrøðingar tala meir um tað órímuliga í, at tað ber til at lána til uppsparing. Tað hevur vundið nógv upp á seg at lána uttanlands til at innseta í føroyskar pengastovnar. Hetta minkar um møguleikan at lætta um hjá teimum ið noyðast at lána fyri til dømis at fáa tak yvir høvdið.

Seinasta ár hevði løgmaður eisini hesa viðmerkingina í síni løgmansrøðu. Tað tyktist at verða torført tá, at fáa nakað tjak um tann spurningin í løgmansrøðuni. Nú segði Signar Hansen, háttvirdi tingmaður, at hann vildi, at Tjóðveldisflokkurin var til reiðar at taka henda spurningin upp til viðgerðar frá botni av og fáa kannað, hvussu nógv hetta nú snýr seg um, um tað nú er soleiðis, at landskassin í veruleikanum verður drenaður fyri munandi nógvar mió.kr. Hann segði tá, at tjóðveldisflokkurin var til reiðar at viðgera henda spurning og eg vil bara boða frá her nú, at tað er Javnaðarflokkurin eisini, vit eru til reiðar at taka og viðgera handa spurningin heilt til botns.

Tað var soleiðis, at tá ið ráðgevandi nevndin var her uppi, hesin spurningurin hevði verið frammi

frammanundan um hesa rentuspeklatión, tá hevði Skak Nielsen, formaðurin í ráðgevandi nevndini hetta við orðið, at hetta her var uttan iva eitt av teimum stóru vandamálunum í hesum samfelag júst hetta, at fólk høvdu loyvi til at lána pening og seta hann inn við vinningi. Vinningurin kemur av tí, at tey fáa loyvi til at draga 42% av rentunum frá sínum skatti. Henda lóg var upprunaliga ætlað teimum fólkunum, sum setast í búgv, tað er eingin, sum er úti eftir tí, at fólk, sum setast í búgv, ikki skulu hava henda møguleika, tað er tað mótsatta. At man undir hesi viðgerðini fer at viðgerða henda spurningin og at løgmaður vísur á henda spurning, er júst av tí, at henda lóg ikki skal verða úthlað og oyðløgd fyri tey, sum hava tørv á hesi lóg, á hesum frádrátti. Tað sigst at tað snýr seg um 200-300 mió.kr. møguliga, sum landskassin missir í skatti. Nú ristur formaðurin við høvdinum. Hann hevur uttan iva betri skil á hesum viðurskiftum, enn eg, men tað er so sagt, at tað snýr seg um 200 mió.kr., sum tey ikki fáa inn í skatti. Er hetta so, vil tað siga tað sama sum tað, at landskassin missir 300 mió.kr., og so má man aftur til Palleba eftir skatti og tolli, til pening til landskassan at gjalda aftur til skattaspekulantarnar tað er tað langa og tað stutta.

Um tað so er, at tað er soleiðis, vil eg mæla til, at landsstýrið tekur henda spurningin upp í álvara, so sum Signar Hansen vísti á og kannar um henda rentuspekulatiónin er so oyðileggjandi fyri landskassan, sum tað verður sagt av mongum og sum tað er víst á í løgmansrøðuni. Javnaðarflokkurin er til reiðar at taka henda spurningin upp frá grundini.

Takk fyri, harra formaður.

Ivan Johannesen (sb)

Harra formaður.

Tað, sum er til viðgerar, er henda sokallaða løgmansrøðan ella eisini frágreiðingin frá løgmanni.

Tá ein hevur lisið hesa frágreiðingina frá løgmanni, so kann generelt sigast, at ein fær ta fatan, at tað stendur so avbera væl til í okkara samfelag, tó fáa vit at vita, at tað er okkurt, sum kanska kundi verið eitt litið sindur øðrvísi, men annars er støðan rættiliga góð, verður tað sagt. Eg meti at hetta er villleiðandi tala, tí støðan er ein heilt

onnur í okkara samfelag. Nú er tað so óheppið, at tað eru fylgiskjøl til sumt av tí, sum stendur í løgmansrøðuni, men til gongdina innan fiskivinnuna og hvussu til stendur har, eru ikki so nógv skjøl, um vit blaða upp og hyggja, at hvussu okkara handilsjavni sær út fyri Føroyar 1988, so verður útflutt fyri 2.185.000.000 kr. og tað verður innflutt fyri 3.355.000.000 kr. ella, tað er er eitt handilsjavnahall fyri 1988 uppá 1.170.000.000 kr.

Um vit hyggja at hesum handilsjavnaðinum fyri Føroyar hetta 4 ára skeiði, sum henda samgongan hevur sitið, fáa vit at vita úr skjølunum, at tað er eitt samlað hall uppá 3.591.000.000 kr., og tað verður lagt aftrat, at tað gongur fínt, og vit hava hoyrt gjøgnum allar fjølmiðlarnar, bæði frá okkara fíggjarmálaráðharra og arðastaðni frá hesi her seinasti 4 árini, at tað gongur fínt, støðan hom batnar í hvørjum hóast, at man etur dupult so nógv, sum vit hava ráð til.

Um vit hyggja eitt sindir at fiskivinnuni harra formaður, so má ásannast út frá teimum upplýsingum, ið fyriliggja um støðuna hjá fiskivinnuni og tað, ið løgmaður skrivar í løgmansrøðuni, at tað hevur lítið við veruleikan at gera, ið hann sigur her. Tað verður sagt, at rakstrartølini fyri 1987 sýna fyri flestu skipabólkar frægari úrslit enn árini fyri. Tað var soleiðis, at í november mánaði fingu vit løgtingsmenn álit frá fiskívinnuráðnum og sýnir tað, at aftan á, at rentur og avdráttir fyri feskfiskaflotan eru eitt mett hall uppá 98 mió.kr. í 1987, og um vit gjøgnumganga tað skjalatilfar, sum er við løgmansrøðuni, so er støðan tann sama, flestu skipabólkarnir klára ikki at gjalda rentuna. Tað verður sagt í hesari løgmansrøðuni í samband við úttalilsi um svartkjaftaskipini, at teir privatu orka ikki meira teir eru útbløddir, verður sagt.

Um vit hyggja at gongdíni bara fyri hesi 3 árini 1985, 86 og 87 so má ein undrast yvir, at henda vinna ikki er uppsteðgað. Tí hallið hesi árini, tá renta og avdrøg eru goldin, er ávikavist 65 mió.kr. 60 mió.kr. og fyri 1987 98 mió.kr. ella fyri hesi 3 árini 223 mió.kr. Nú veit eg ikki, hvussu verður fyri 1988 men tað sær ikki gott út soleiðis sum støðan er í løtuni. So tað kann ikki verða leingi

onnur í okkara samfelag. Nú er tað so óheppið, at tað eru fylgiskjøl til sumt av tí, sum stendur i løgmansrøðuni, men til gongdina innan fiskivinnuna og hvussu til stendur har, eru ikki so nógv skjøl, um vit blaða upp og hyggja, at hvussu okkara handilsjavni sær út fyri Føroyar 1988, so verður útflutt fyri 2.185.000.000 kr. og tað verður innflutt fyri 3.355.000.000 kr. ella, tað er er eitt handilsjavnahall fyri 1988 uppá 1.170.000.000 kr.

Um vit hyggja at hesum handilsjavnaðinum fyri Føroyar hetta 4 ára skeiði, sum henda samgongan hevur sitið, fáa vit at vita úr skjølunum, at tað er eitt samlað hall uppá 3.591.000.000 kr., og tað verður lagt aftrat, at tað gongur fint, og vit hava hoyrt gjøgnum allar fjølmiðlarnar, bæði frá okkara fíggjarmálarráðharra og arðastaðni frá hesi her seinasti 4 árini, at tað gongur fint, støðan hom batnar í hvørjum hóast, at man etur dupult so nógv, sum vit hava ráð til.

Um vit hyggja eitt sindir at fiskivinnuni harra formaður, so má ásannast út frá teimum upplýsingum, ið fyriliggja um støðuna hjá fiskivinnuni og tað, ið løgmaður skrivar í løgmansrøðuni, at tað hevur lítið við veruleikan at gera, ið hann sigur her. Tað verður sagt, at rakstrartølini fyrí 1987 sýna fyri flestu skipabólkar frægari úrslit enn árini fyri. Tað var soleiðis, at í november mánaði fingu vit løgtingsmenn álit frá fiskivinnuráðnum og sýnir tað, at aftan á, at rentur og avdráttir fyri feskfiskaflotan eru eitt mett hall uppá 98 mió.kr. í 1987, og um vit gjøgnumganga tað skjalatilfar, sum er við løgmansrøðuni, so støðan tann sama, flestu skipabólkarnir klára ikki at gjalda rentuna. Tað verður sagt í hesari løgmansrøðuni í samband við úttalilsi um svartkjaftaskipini, at teir privatu orka ikki meira teir eru útbløddir, verður sagt.

Um vit hyggja at gongdini bara fyri hesi 3 árini 1985, 86 og 87 so má ein undrast yvir, at henda vinna ikki er uppsteðgað. Tí hallið hesi árini, tá renta og avdrøg eru goldin, er ávikavist 65 mió.kr. 60 mió.kr. og fyri 1987 98 mió.kr. ella fyri hesi 3 árini 223 mió.kr. Nú veit eg ikki, hvussu verður fyri 1988 men tað sær ikki gott út soleiðis sum støðan er í løtuni. So tað kann ikki verða leingi

til henda her sokallaða fiskivinna okkara steðgar upp.

Tað verður eisini sagt í løgmansrøðuni, at tær umsóknir um serlán, ið innkomnar eru, prógva eisini, at ikki stendur so illa til í okkara fiskivinnu sum summir prestar prædika.

Nú var tað ein prestur har úti, sum mátti rýma, so tað er ringt at vita, hvat hinir hava at prædika Eg haldi, at, um umsóknirnar um serlán skulu nýtast sum prógv fyri at tað ikki stendir so illa til innan fiskivinnuna, so áttu vit løgtingsmenn at fingið hetta skjalatilfar útbýtt, tí tað er rættiliga álvarsamt, haldi eg, at løgtingið hevur sett 150 mill. av til serlán, sum møguliga ikki er neyðugt, so eg vóni, at vit fáa tað eitt sindur meira inn í skjølini, hvat løgmaður grundar hetta úttalílsi á. Eftir tí,ið fjølmiðlarnr hava borið út, so fáa vit at vita, at tað eru innkomnar 110 umsóknir um serlán, og tað koma nakrar eftrat, so eftir tí, er ein stór mió.kr. avsett í part.

Nú kann man gera sínar egnu metingar, tað er mín metan, at tað eru fleiri skip, sum hava einar 2 og 3 mió.kr. í kassakredittum umframt leysaskuld, so hetta verður ikki tann stóra hjálpin, ið avsett er í hesum serlánum. Henda lógin um serlán varð samtykt 21. apríl og tað ljóðaði, at klárt skuldi verða at gjalda út til Ólavsøku, men enn er veruleikin tann, at tað er eingin umsókn liðugt viðgjørd, so her er ikki nógv at heinta, einasta ein kann gera, tað er at hava gott tol.

Tað verður í løgmansrøðuni afturvist, at fiskivinnan og harvið alt tað føroyska samfelagið er í einari kreppu, sum ongantíð áður, eisini verður afturvíst at samgongan hevur svøltað fiskiflotan ella hevur skapt húsagang. Eg haldi, at hetta úttalilsið er líka sum er eitt suff fyri at reinsa sína samvisku. Hetta hevur íð hvussu so er einki við veruleikan at gera. Tað er í øllum londum vanligt, at tey royna at stuðla vinnulívið. Í Føroyum er størt sæð bara fiskur, ið vit útflyta og tað er tað sum er berandi í okkara samfelag.

Nú kunnu løgmaður og samgongan afturvisa, sum teir vilja, men tann kaldi veruleíkin er, at tann førdi politikkurin hesi seinastu 4 árini er orsøkin til, at okkara vinnulív er í einari djúptgangandi kreppu, sum ongantíð áður tað er bara ein kaldur veruleiki. Tað er eisini ein veruleiki, at hetta at privatmenn eiga skíp er í ein stóran

mun við at fjarða burtur, menn hava mist móti, tí at tað lønar seg ikki at eiga skip, man skal leggja rygg til og einki fáa burtur úr og so tá ið úrsliti er uppgjørt so er tað bara ein stór rokning sum verður hangandi eftir á rygginum og tað sum er veruleiki í dag tað er tað at allir royna at sleppa sær burtur úr hesum sum eitur fiskivinnan og fiskiskip. Tað verður val í heyst og eftir míni metan so er stórsta uppgávan hjá eini komandi samgongu, tað er at fáa okkara høvuðsvinnu aftur at koyra sum eitt sunt vinnuliv. Tað eru samtyktar stórar íløgur ja, fyri mia.kr. og tær eru á ymiskum økjum, tað eru skúlar, havnir, sjúkrahús og mangt annað. Tað kann alt verða gott við tí, eg skal ikki viðgerða tann spurningin meira, men tað skal alt hetta her alt samalt sum er viðtikið tað skal gjaldast av einum vinnulívið sum liggur í lasum, og tí er tað trupult at siggja ella hóma hvussu hetta skal bera til. Tað verður sagt, at Føroyar eru ein fiskivinnu tjóð og okkara útflutningur er mest sum bara fiskur.

Tað ein hevur fingið upplýst so er tað 1700 fiskimenn í Føroyum tað vil siga, at tað er, um man roknar tað soleiðis at tað eru heilárs fiskimenn so eru tað umleið 1700 fiskarar út av einari fólkamongd upp á 49.000 fólk. Og tí má tað viðgangast at hesir her 1.700 fiskimenninir mugu verða ógvuliga effektivir og raskir, tá teir kunnu livbjarga øllum hinum sum búgva í landinum. Um man hyggur eftir so er tað umleið 28-29 fólk pr. fiskara sum út av hesi mongdini her, so hvør fiskimaður hevur eini 28-29 fólk at bera á sínum herðum. Tað vísir seg soleiðis at hetta her við at sigla og verða fiskimaður, tað er nakað sum ikki er aktraktivt, fólki trekkir í land, tí har eru betur kor, alt er betri, tað vil siga, at okkara lívsgrundarlag er við at fjarða burtur undan okkum.

Í løgmansrøðuni verður eisini komi inn á uttanlandsskuldina í eftir hesum her fylgiskjølunum er sett til fyri 1988, 4.610.000.000 kr. og sum í 1984 var 3.060.000.000 kr. Nú er tað soleiðis, at tann størsti parturin í uttanlandsskuldini frá 1981-1985 vóru farmaskipini og sum øll vita, so eru øll hesí her skipini seld og sjálvandi er eisini tann uttanlandaskuldin burtur og hevur tí positiva ávirkan á uttanlandsskuldina hjá

So um hesi skipini høvdu verið her í dag og siglt í tí føroyska skipaflotanum, so hevði uttanlandsskuldin verið fyrst hesar her 4.610.000.000 kr. plus einar 800 mió.kr. aftrat, tað vil siga einar 5.410.000.000 kr. Tað vil siga at tað er ein vøkstur í uttanlandsskuldini fyri hetta 4 ára skeiðið uppá 2.310.000.000 kr., so her er aftur eitt sýndarligt prógv um tað vánaligu gongdina hesi seinastu 4 árini, tað verður sagt at uttanlandaskuldin er 1000-1500 mió.kr. minni, enn mett varð í 1984. Eg fari at loyva mær at spyrja, hvørið hevur mett hetta her í 1984. Eg veit ikki, um tað var brúkt í valagetatiónini hjá Atla Dam ella hvør hevur mett hetta her ið hvussu so er í fjør. Tá ið Det rådgivende udvalg var her í Føroyum, spurdi eg um hetta, um tað vóru teir, sum høvdu úttalað hetta og tað var pástaðið og sagt heilt týðuliga á fundi við Det rådgivende udvalg, at teir høvdu ikki sagt, at uttanlandsskuldin bleiv 5-6 mia.kr. tí tað kundu teir yvir høvur ikki úttalað seg um. Tí er tað, at eg spyrji, hvør er tað, sum kemur við hesi metingini? Tað hevur eisini vist seg , at henda metingin verður brúkt sum ein slags sovipúta fyri at vísa á, at tað gongur so avbera gott, nógv betur enn nakar hevði roknað við.

Harra formaður. Eg haldi ikki, at tað hevur gingið væl í hesi 4 árini. Eg fari at gera eina lítla viðmerking til okkurt, sum hevur verið sagt.

Tað var æraði tinglimurin Jørgen Thomsen sum var uppi her.

Hann segði,at henda samgongan hevði verið bundin av íløgunum, sum undanfarna samgongan hevði framt og her var tað serliga farmaskipini, sum nomið varð við.

Tað var soleiðis, at tað komu nógv skip frá 1981-1984, og øll hesi skipamálini komu í gjøgnum fíggjarnevndina og tí kann man spyrja, hvørja støðu nú Javnaðarflokkurin hevði til hesi skipamálini, sum komu í gjøgnum figgjarnevndina frá 1981-1984, tí tað var har, teir høvdu høvi til at siga sína meining. Og tað er veruleiki, at Javnaðarflokkurin atkvøddi fyri øllum farmaskipum, sum komu í gjøgnum figgjarnevndina, og harafturat atkvøddu teir fyri tveimum skipum, har hvørki Sambandsflokkurin ella Sjálvstýrisflokkurin atkvøddu fyri, tvey skip, sum eisini eru farin á húsagang í dag. So tað var táverandi andstøðan, sum millum annað koyrdi tey bæði skipamálini ígjøgnum. Harra

formaður. So var æraði tinglimurin Adolf Hansen uppi her, hann hevur borið hetta fram onkuntíð í figgjarnevndini eisini, men tað sum hann segði tað, var hetta, at hann frøddist, um at tær óløgligheitir, sum eru farnar fram á skrivstovuni hjá almannaráðharranum, eru steðgaðar, tær eru hildnar uppat síðani Karolina Petersen kom út í landstýrið, nakað soleiðis segði hann orðarætt.

Harra formaður. Eg haldi bara tað, at um tað er soleiðis nú, er tað soleiðis, harra formaður, at løgtingið velur landsstýrið, og um ein maður úr samgonguni kemur upp her og pástendur, at tað eru óløgligheitir farnar fram úti í landstýrinum, so er tað ein spurningur fyri meg, kunnu vit tingmenn bara sita tigandi og ikki taka henda spurningin upp? Eg haldi, at tað er fullkomuliga óforsvarligt bara at lata henda spurningin man kann siga í slatur og sley, tí so leingi vit einki prógv hava fyrí nøkrum her á tingbori, so er tað at meta sum slatur og sley sum kemur út her frá tingsins røðarapalli og sum kemur út um alt landið. Eg sigi fyri meg at eg kann ikki bara góðtaka hetta, og tí haldi eg, at formaðurin og formansskapurin eiga at taka henda spurningin upp, er tað rætt bara at lata hann standa leysari luft, at tað eru óløgligheitir farnar fram úti í landstýrinum.

Harra formaður. Viðvíkjandi orkumálum skal eg bara nevna eitt lítið sindur. Tað stendur eitt sindur á síðu 13 um tann spurningin, har stendur m.a., at hóast orkuráðið kletta fast hevur ávíst, at SEV tveitir 40% av orkuni burtur við at útbyggja í neðra, so er hendan hildin fram í heimildarloysi. Eg skal ikki siga so nógv um hatta, men tað er soleiðis, at SEV hevur gjørt eina kanning av útbyggingini uppi í hæddini av orkuútbyggingini, hetta tilfarið er alt sent til landsstýrið, og tað visur heilt greitt, at tað ikki er lønsamt at fara upp í hæddina og at tað er sera ivasamt, hvussu ið úrslitið verður við at fara upp í hæddina at útbyggja. Nú vóru vit so hepnir at vit fingu útfliggjað tilfarið frá orkuráðinum saman við løgmansrøðuni, og við tað at tað tilfarið er sent til Føroya landsstýri frá SEV, tað er gjørt av landsbyggifelagnum, P.A. Petersen og Højgaard og Schultz, so haldi eg, at tað er nattúrligt, at landsstýrið eisini sendí tað tilfarið við niðan til løgtingsmenn soleiðis, at

allir fáa kunning, um hvussu tað er á tí økinum. So, harra formaður, eg fari at heita á løgmann um eisini at lata løgtingsmenninar fáa tað tilfarið útflýggja so, at vit kunnu siggja sakina frá báðum síðum so at hetta her showi heldur uppat. Takk fyri.

Asbjørn Joensen (sf.)

Harra formaður.

Vit eru nú farnir undir at viðgerða røðu løgmans á ólavsøku. Henda er hin fjórða og seinasta í røðini tá hugsa verður um at valskeiði nú er runnið í november. Tað er vónandi ikki ov mikið avgjørt, at man torir at pástanda at tað verður val til november nú ári er vorði so gamalt, men ásannast má, at tað hevur ikki skorta upp á royndirnar at fáa hetta her tíðarskeiði broytt soleiðis, at vit fingu val í úrtið. Hetta hevur tíbetur ikki eydnast, hvørki sampartnarum ella andstøðu og tað er sjálvandi samfelagnum til mikið gagn. Ósemjur og klandur er helst eitt eyðkenni fyri okkum og hetta boðar søgan okkum eisini frá. Bara vit fara til Kirkjubøar og siggja katedralin har sum stendur sum ein múrur, so vil onkur søgumaður pástanda at hetta er orsaka av innhýsisi klandri. Helst er tað so, at vit neyvan vilja viðurkenna slíka frásøgn, men tað stendur í hvørtfall fast, at vit einki hava í móti at syngja um at samanhald tað er ikki okkara eyðkenni. Hetta arbeiðslag merkir sjálvandi eisini tingarbeiði. Ikki vilja vit breyða burtur úr og helst er tað so at onkur mátar sína styrki í ósemju í staðin fyri í samstarvi, í teirri vón, at hetta gevur tað besta valúrslitið. Eingin ivin er um, at hetta verður eisini tað sum lurtarin fær burtur úr hesum her kjakið her á tingi í dag. Stutt er til vals, fegin vilja vit allir halda pláss. Hetta er eisini byrjanin til eitt valstríð, so bæði tað sum løgmaður saman við landsstýrismonnum sínum ið førir fram, sum vælaverk í røðuni á ólavsøku og andstøðan av hesum týðiliga boðar frá, at hon er ósamd við hann. Hetta her er alt ikki ørðvísi enn tað sum vit eru von við, vit kunnu pástanda, at her er alt við tað gamla. Ofta hava vit hoyrt málberingina um at eitt hvørt landsstýri ella løgting byggir á herðarnar á tí undanfarna. Eg trúgvi sjálvur, at hetta her var eitt rimiligt úttalilsi fyri 15 árum síðan og

og longur aftur. Men samstundist ivist eg av góðum grundum í, um hetta orðafellið er nýtiligt í dag. Orsøkin til hesa hugsan er, at fyri árum síðani høvdu menn fyrilit, alt var meira umhugsað mótvegis nú, hvar alt er meira tílvildarligt. Vit eiga ikki evnini til at bera góðar tíðir, hetta er ofta vorðið sagt her á tingi. At skilja í millum tað neyðuga og tað ynskiliga stutt sagt vit duga ikki at nýta hógv. Undanfarnu samgongur kastaðu alt skil fyri borð og hevur tað verið lutur okkara, ið hava skipað landsstýrið seinastu 4 árini, at rætta upp aftur tað ið vit allir meira ella minnið hava verið við til at gjørt.

Nú hava vit við undanfarnu røðarum hoyrt eina lítla holmgongu ímillum partamann mín og Paula Ellefsen tá snúði tað seg mest um farmaflotan. Eg skal ikki fara at taka dagar ímillum her, men sjálvandi er ein og hvør førur fyri at døma ein annan og minni um seg sjálvan, men eitt er ið hvussu so er rimmar fast, at um Pauli Ellefsen og samgongur og Føroya løgting høvdu lurtað betur eftir teimum ráðum, sum mín partamaður hevur ført fram her á tingi tey nógvu árini og tey seinastu serliga, so var hetta samfelgið munandi ríkari og tað vóru nógv færri, sum nú høvdu fíggjarlig ting at dragast við, sum tey kundu verið fyriuttan um tey høvdu fylgt tí ráðgevingini. Farmaflotin er ein sorgarsøga saman við ørðum mistøkum vit hava gjørt, og eg haldi, at tað er rímuligt, at tá man framførir hetta her óhepna tíðarskeiðið bæði í bløðum og í orðum, hví so ikki ásanna, at tað er mark fyri, hvat vit eru førir fyri og at menn, sum tá royndu at leggja seg til í orku, faktisk vóru eins fyri og arðir, sum gjørd mistøk. Eg havi fingið fatur á t.d. einum uppleggi frá tí danska fólkatinginum í samband við lóg um"international skibsregister" við meira og her boðar man týðuliga frá, hvussu støðan er innan fyri danska handilsflotan í sama tíðarskeiði, sum vit eru við at byggja upp og við formansins loyvi fái eg loyvi at citera eitt lítið sindur, hetta er ráðharrin, sum leggur tað fram, hann sigur: "Den langvarige skibsfartskrise har i løbet af de sidste 10 år reduceret antallet af skibe med godt en trediedel, alle de antallet af skibe har medført, at antallet af beskæftigede i handelsfloden er reduceret fra godt 17.000 til knapt 10.000, dette er især gået ud over deres besætninge. Rederiernes bruttoindtjening hvor af der skal dækkes afskrivninger,

renter og skat er faldet betydeligt i 80'erne. Bruttoindtjeningen udgjorde i 1986 2,8 mio.kr. hvilket kan dække forrentning og fremmedkapital for 15 mia.kr. som avskrivning på skibernes kostpris der andrager 31 mia.kr. Also hetta sigur mær í einum tíðarskeiði, hvar man má ásannað at tann danski handilsflotin er í afturgongd í ríkiligt mát, tá fara vit at byggja eín handilsflota upp sum í kostnaði yvirhøvur ongar møguleikar hevur til forrentning. So hatta í seg sjálvt sigur at vit hava gjørt eitt álvarsligt mistak og vit áttu har at havt fingið eitt lítið sindur av innlitið kanska frá fólkatingsmonnum sum høvdu verið betri í ráðum enn teir hava verið í bløðunum, hvar bara útspillingin er tað alt avgerandi. Men í samband við tað sum her er komi fram so er at fegnast yvir at henda samgonga kendi sínar skyldur, at henda evnaði at fyriskipa soleiðis fíggjarliga at vit vóru mentir av basa mistøkunum ið vóru og vildu verðu ein órímilig byrða at lagt á fiskivinnuna í hevur borið og kemur at bera tær byrðar sum hetta samfelagi skal lyfta, uttan mun til, hvat ið tingmenn útattil vilja royna at øsa um fortelja fólki so er tað bara fiskivinnan ið skal avskriva, forrenta øll tey mistøkini sum vit hava gjørt. Tað at vit soleiðis hava lagt skattabyrðar á føroyska skattgjaldarnar soleiðis, sum 14. September hevur hug til at breggja sær av. Tað hevur verið fyri neyðini fyri at laga upp fyri so bøtast kundi um tey mistøk sum gjørd eru, men betur vóru vit hesar skattabyrðar fyri uttan og tí er litið at erpa sær av í so máta, men eg eri glaður fyri, at hetta landsstýri soleiðis sum Hilmar Kass hevur ført tað fram var so liberalt og so væl sinnað yvir fyri at loysa trupuleikarnir at vit kundu samstarva um tað neyðuga í hesum tiltaki. Neyðugar nýskipanar, soleiðis nevnir løgmaður ein av pørtum sínum í røðuni. Vit kunnu verða samdir um at neyðugt er og verður at broyta burtur úr nýggjum, men eins neyðugt er at ásannað at hetta eigur at verða fyriskipa við meira varni enn tað sum higartil er gjørt, at íløga og møguleiki fyri at tað nýskipaða er til gagn fyri føroyskan búskap og tað samfelagi sum vit nú einaferð búleikast í. Vit hava

gott nokk onkran innan sam-
gonguna, ið hevur, haldi eg,
miskilt eitt sindur, tá vit
tosa um nýskipan av veiðiflota
við meira, men tað munnu verða
orsøkir, sum man kann bøta
uppá. Svartkjaftavinnan, sum
øll stórmenni innan føroyskan
politikk hava tilbiðið seinastu
árini, eingin nevndur eingin
undantikin, vísti seg ikki at
røkka til vónir. Vit sita eftir
vónsviknir við eini órímuligari
ábyrd av skattgjaldaran kanska
nær um 100 mió.kr.
meiningsleyst, metir hann
ivaleyst, sum situr og líður á
í slíkum óskili, men hann má
bera sín part av hesi her
útreiðslu eisíni. Helst er tað
so, at onkur vil bera í
bøtuflaka fyri sær og sínum,
men her er eingin vón, allar
hesar partapolitisku kompurnar,
ið átaka sær rós fyri onkra
hendinga skilagóða loysn, verða
at taka ábyrd av hesum øki.
Henda miseydnaðist totalt og
mest sjálvandi teir, ið fast
hildu, at henda vinnan var
loysnin upp á loysingina. Tað
er harmiligt, at tað skuldi
verða so, men vit hava tó tað
treystið eftir, at einaferð í
framtíðini gerast møguleikarnir
og tí er tað mín metan, at vit
ikki hava ráðini og heldur ikki
mugu gevast heilt á hálvari
leið.

Annars haldi eg, at løgmaður
ger ikki nógv burtur úr
fiskivinnini í heimasjógvi, m
ein kundi væntað tí, tá ið man
hevur verið við til hesar
skilagóðu fundirnar, sum
man hevur árliga um fiskivinnu,
so fáa vit ferð eftir ferð at
vita, at fiskivinnan í
heimasjógvi, tað er henda sum
gevur tað mesta til føroyskan
búskap og tí vildi eg ynkst og
eg ivist heldir ikki í at tað
letur seg gera, at vit kunnu
skapa eina betri framtíð fyri.
Tað er langt í millum tey góð
frættini, tá ið tosað verður um
fiskivinnu, nú var løgmaður her
og segði eitt sindur frá sínum
samráðingum í Kirkjubø. Persón-
liga vóni eg at Kirkjubø-loysn-
in verður til meira gagn fyri
okkum enn tann sokallaða
panoramaloysnin men tað fer nú
tíðin at vísa.

Eg haldi, at hatta var í
hvørt fall eitt gleðiligt tekin
um, at har er nakað í væntu,
eg verið noyddur at gevast nú
men eg vóni, at menn duga
soleiðis at skipa fyri, at tað
veruliga spyrst nakað burtur úr
og at vit fáa nakað aftur fyri
tann nógva peningin, sum
landskassin hevur ofrað upp á
at varðveita ognirnar uppi í
Føroyingahavnini. Takk fyri

Flemming Mikkelsen (sb)

Í kirkjuni ólavssøkudag, har Hvalbiarpresturin Birgitta Johannesen sum vanligt við vælvaldum orðum bar boðskapin út til bæði siggjandi og hoyrandi, segði hon m.a., at tað var við blandaðum kenslum, hugsað varð um Ólav Heilaga í samb. við Halgubók.

Tíma seinni, tá ið eg í tingsalinum lurtaði eftir tí boðskapinum, løgmaður hevði at bera siggjandi og hoyrandi føroyingum, runnu omanfyri nevndu orð fram fyri meg, og eg skal viðganga, at tað var við blandaðum kenslum, hugsað varð um føroyska samfelagið í samband við løgmansrøðuna.

Harra formaður.

Út við 4 ár eru farin, síðani Atli Dam, løgmaður, gjørdi seg kendan út um landamark fyri at taka við ábyrgdini og leiðsluni av føroysku bananrepublikkini.

Hann bað tá veljaran geva sær 500 dagar at fáa hetta her niðurundirkomna samfelagið aftur á føtur. Hann hevur fingið nærum 3 ferðir tað, hann bað um, og veljarin hevur nú fingið ein fyribils samandrátt frá løgmanni um, hvussu hann metir støðuna í samfelagnum í dag.

Løgmaður er væl nøgdur. Hann leggur út við, at tað er merkisvert, at ein so stórur partur av einari politiskari stevnu kundi innast í verki hetta tíðarskeið.

Jú, tá ein hevur í huga, at hetta er nr. 2 samgonga í hesum her valskeiðnum, so má ásannast, at løgmaður við hjálp frá sjálvstýrisflokkinum, Niels Pauli og Adolfi er komin væl nærri sosialistiska dreyminum, har øll eiga alt, eingin eigur nakað, tí um hamurin er ymiskur, so er endamálið tað sama, rósur til tey fáu og tornur til tey mongu.

Løgmaður, hann ásannar, at trupulleikar eru í samfelagsbúskapinum. Men kortini eru hesir ikki størri enn so, at ein avmarking við einum 300 mió.kr. setir okkum í eina javnvágstøðu. Orsøkin til henda ójavna er sum vant, at einstaklingar, feløg og spekulatar, teir innanhola føroyska búskapin. Hin vegin fáa vit at vita frá samgongupartnara, at tann peningaligi ólevnaðurin, ið er farin fram, hevur skuldabundi okkum í 10. lið, og hetta her meðan framleiðslutólini eru latin øðrum fyri lítið og lætt. Tá ið vit konstatera, at fíggjarlógin er vorðin 100 tals milliónir størri, enn okkara nettoframleiðsluvirði, so er ikki neyðugt at hava nógv innan fyri fyri at vita, hvønn veg tað

ber.

Tað sær út, sum løgmaður ikki hevur varnast, at róðurgreiðirnar als ikki virka. Hann setur sína vón til ein landsbanka og hann roynir at hella seg til eina óveruliga bruttotjóðarinntøku, sum fyri ein stóran part er vorðin til av øktum óbeinleiðis og beinleiðis lánibyrðum sum okkara framleiðsla, okkara útflutningur í síðsta enda skal gjalda. Fyri 4 árum síðan bedýraði løgmaður, at uttanlandsskuldin skuldi trappast niður, samanbera vit umstøðurnar við umheimin í 1982 83 og 84 við umstøðurnar hesi seinastu 3 árini, so mugu vit bara ásanna, at løgmaður heldur ikki her hevur hildið orð, uttanlandsskuldin er vaksin við rakettferð hesi árini uttan, at stórvegis framleiðsluvirðir liggja eftir.

Harra formaður í 12. tíma heldur løgmaður nú, at vit eiga at tálma íløguna, tálma tær nakað ið hvussu so er, men ávis samskiftisíløgum slepst ikki undan. Nú veit eg ikki, hvat løgmaður hugsar um her, men viðvíkjandi samferðslumálum har nevnir løgmaður 2 sokallað tung mál, og eru hesi her ferjulegan á Gomlurætt og undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi, og sambært Lassa Klein so skal Gásadalsbergholið í gongd einaferð í heyst.

Harra formaður, ferjulegan á gomlurætt má verða verðsins dýrasta politiska neyðaregg nakrantið, hetta her tiltakið, sum kemur at kosta eitt ókent tal av milliónum, eigur onga framtíð í sær, er heilt einfalt ótíðarhóskandi frá byrjan og loysir als ikki framtíðarsamferðsluspurningin viðvíkjandi Sandoynni. Hitt málið undirsjóvartunnilin fekk eina merkiliga vend, felagsskapur í Vágum hevði saman við ørðum góðum monnum gjørt eitt veldugt arbeiði bæði teknist og figgjarligt fyri at loysa hetta her málið, tá landsstýrið og almenningurin vórðu kunnað um hetta her mál, so gjørdu landsstýrismaðurin Lassi Klein og táverandi formaðurin í samferðslunevndini Tordur Niclasen av at bjóða Vága tingmonnunum ein sight seeing túr til Noregs fyri at siggja, hvussu norðmenn arbeiddu við slíkum málum.

Henda innbjóðingin fekk tingformannin at gera álvarsliga vart við seg, og hann segði m.a. við formansins loyvi "Lat tað verða sligið fast og rimmar fast, at henda samgongan fer undir engum umstøðum at kasta seg út í eitt figgjarligt vónloysi við einum bergholi undir botninum á Vestmannasundi". Hetta her vóru álvarsorð harra formaður, søgd á røttum stað. Síðan hendi tað, at róðurgreiðirnar als ikki virka.

at landsstýrið tekur málið í sínar egnu hendur, og eitt ár seinni ber samgongan við tingformanninum sum 17. manni hetta sama mál niðan í løgtingíð, har tað verður samtykt.

Jú sjálvandi skulu vit útbyggja land okkara, men mær vitandi er fíggjarstøðan bara versnað, síðani hesi her megnar orð vóru søgd. Spurningurin er tí, er tað fíggjarliga vónloysið, sum væntað var fyri einum ári síðani, hasað av soleiðis, at vit valdagin í november mánað kunna hava ikki minni enn 5 bergholsgerðir fyri í senn, her verður ið hvussu so er boðað frá, at Vestmannasund skal borðast og Gásadal áðrenn valdagin, og sum er hava vit Kunoynna, Lopra og Sumba og Kalbak/Sigmabøur, sum eru í gerð og eisini hevði verið vert at vita á hvørjum økjum, løgmaður ætlar at tálma íløgurnar.

Harra formaður, løgmaður hongur seg óført í eitt landskassahall í 1984/1985 uppá 60 mió.kr., meðan hann heilt gloymir armóðstíðina í 1979/1980, tá alt var koyrt lemjandi fast og løgmaður gjørdi

av at leggja frá sær.
Meðan umsóknirnar eins og nú streymað inn til Tinganes um kreppuhjálp, og tá hvør kassi og hvør grunnur vóru gapandi tómir, og hansara egnu vóru við at áseta eitt hungursmark fyri Føroyar. Men tá løgmaður 4 ár seinri kom fram at aftur, tá vóru umstøðurnar broyttar rættiliga. Føroyingar vóru so væl fyri, at løgmaður setti seg at merksúgva hvørt húsarhald í Føroyum við 15.000 kr. árliga, og harvið skapa sær eitt óvanligt landskassaavlop fyri 1986-1987 upp á góðar 600 mió.kr. hesi bæði árini. Alt meðan fiskivinnan og farmavinnan bløddi burtur.

Harra formaður tað er ikki alt avgerandi annað hvørt vit eiga nakrar kr. til góðar, ella vit skylda nakrar kr. í landskassanum. Tað alt avgerandi er at okkara eksistensur okkara tilveru grundarlag koyrir og koyrir væl. Har skulu vit fyrst og fremst til fiskivinnuna og sjóvinnuna og har stendur alt annað enn væl til.

Mær rennur í huga orðini, mín góði vinur Juul Jacobsen hevði á munni, tá hann í 1986 í móti síni samføring atkvøddi fyri inntøkulógunum hjá táverandi samgongu. Hann segði millum annað, at hetta er byrjanín til undirgang, eg ræðist tykkum, eg gráti um børn tykkara, tá vinnulívið týnist, og hettar kom tíverri at passa óhugnaliga væl.

Tað sum eftir av vinnutólunum, tað ekur á knøðunum og talið á teimum, sum við húgvuni í hondini noyðast tað tungu gongd út í Tinganes, at biðja sær um kreppuhjálp í tí vón, at hesin óndi politiski dreymur fær eín enda, tað økist í hvørjum.

Tað verður alsamt roynt at billa fólki inn, at fiskivinnan er í kreppu fiskivinnan útarmar landskassan o.s.f., hettar er í míni verð at venda øllum á høvdið.
Fiskivinnan, høvuðsgrundarsteinurin undir tí føroyska samfelagnum, undir tí føroysku vælferðini er ikki meira í kreppu í dag enn, hon altíð hevur verið. Fiskivinnan hevur allar dagar havt skiftandi inntøkuár, og nú seinastu 10 árini eru royndarmøguleikarnir avmarkaðir í so stóran mun, at okkara dýru nýmótans skip fáa ikki endarnar at røkka saman.

Fiskimenn og sjófólk okkara á nær og fjarleiðum hava ongantíð spart seg, teir hava vissuliga lagt kropp til, meðan vit uppi á landi

serliga hesi seinastu árini, ikki hava dugað at húsast og umsitið tað natúrligu til-og frágongd, sum føroyska samfelagið einaferð er undirgivið. Grundarlagið er farið at ridla av álvara. Vit liva heilt einfalt yvir evnini, vit byggja vit bora vit keypa og ferðast o.s.fr. sum ongantíð fyrr, vit hava tilsýnilátandi ráð til alt millum himmal og jørð, meðan høvðusvinnan armast dag frá degi.

Harra formaður. Fyri hvønn dag sæst týðuliga, at føroyska samfelagið legst meira og meira á líðina, yvirbygningurin er vorðin alt ov stórur og barlastin svarar ikki til longur.

Tá páskakreppan í landsstýrinum tók seg upp, lupu tveir í land, meðan tvey onnur av neyð lupu umborð aftur, og nú lúnningin er við at fara undir, sigur ein av trúgvastu samgongulimunum Karin Kjølbro, løgtingskona at hon er farin at ræðast, hon ræðist risa fíggjarlógina, hon sjálv hevur staðið hæddir til, hon ræðist pakkar, hon er tvingað til avgjørda støðu viðvikjandi okkara fiskiflota, hon kennir maktarloysi á sær, hon pástendur, at fyrilest atkvøðufiskaríð hevur ført við sær, at samgongan fullkomiliga hevur mist tamarhald á støðuni, og hon heldur fast við, at fiskimálaráðharrin Atli Dam hevur fingið so lítið av skafti hetta valskeiðið at ov seint er at gera nakað við hetta nú. Jú her melur groft, nú vit nærkast endanum, allir royna at vaska hendir sum fragast og minnast vit hólmgonguna í millum tingformannin og løgmannin ella, sum tikið verður til millum skipara og kok, tá eykatingsetan varð sett fyrst í juni mánaði, so skiltu flest øll, at áralagið inn á samgonguna var so vánaligt, at tað tyktist sum um fleiri høvdu lagt inn. Stríðið stendst mest av at Tjóðveldisflokkurin heldur seg ikki hava livað upp til loysingina í sama mun, sum Javnaðarflokkurin, tí nú manglar so lítið í, at Tjóðveldisflokkurin ikki fær gjørt rættiliga vart við seg, nú ríkisfelagskapurin fyri mesta partin hongur saman í krónum og oyrum. Men harra formaður, hóast hesa vónleysu og ótolandi støðu á øllum økjum, so heldur løgmaður at samgongan óskammað kann fara fram fyri dóm veljarans í heyst.

Spurningurin má tí verða, um løgmaðurin undirmetir veljaran so groft, at hann ósmæðin kann taka so grovan til, men harra

formaður, livst so spyrst.

Øll onnur vita, at tá ið tey gera eitt gildi, so skal tað gjaldast. Gildið, løgmaður hevur hildið hesi her 4 áríni, man hava kostað nakað, tí nú gongur upp fyri løgmanni, at einki gildi er ókeypis, og rokningin kemur so ella so. Men hann lovar, at nú skulu sterkastu og breiðastu herðarnar sleppa at bera rokningina, tað kundi verið vert at vita, hvønn løgmaður hugsar um í hesum her viðfangínum, tí mær vitandi, er vanligí føroyingurin so fíggjarliga akslasneiddur nú løgmaður leggur frá sær at har legst einki omaná.
Harra formaður. At enda saman umtikið sær ikki so væl út, sum løgmaður prædikar, men harra formaður burtur úr hesum her politiska myrkrinum, vit aftur hava upplivað við Atla Dam á odda, er bara ein gongd leið og henda møguleikan áttu allir hugsandi føroyingar at gjørt brúk av komandi løgtingsval í heyst. Takk fyri.

Óli Breckmann (ff)

Harra formaður.

Snøggari og beinari eftirmæli fyri ikki at siga gravskrift kundi fáur givið hesi samgongu, sum tá ið Hilmar Kass í farvæl salvu síni í seinastu viku gav sinum egnu hetta skotsmál við forðmansins loyvi, hann segði: "Í dag skulu løgtingslimir avgera, hvør skal á húsagang og hvør ikki". Hóast eingin kann siga tað betur enn Hilmar við hesum trimum blaðreglunum, so hevur tann 21. síðu langa ólavsøkurøða løgmans nakrar fáar reglur fyri neyðini, tað verður heldur ikki til meira.

Røðan byrjar við tí sera truplu búskaparstøðuni í 1984 og 1985. Jú, vist var tað nakað trupult, oljuprísurin var dupult so høgur sum nú og oljurokningin til skip og land hareftir, men hóast flotin tá drógst við 100 mió.kr. í oljukostnaði meir enn nú og hóast serliga upsaprísurin fall í 1984, so bóru vit so í bandi, at flotin so dánt gekk við avlopi og við góðum hýrum Dollarin tá var dupult so høgur sum nú, og uttanlandsskuldin tískil 500 mió.kr. hægri noterað enn neyðugt, tað av kurstapum, Risa íløgur vórðu gjørdar í farmaskip fyri 750 mió.kr. í eini roynd at slóða nýggjar leiðir har, sum kvotur ikki stongdu av fyri framtíðini, men ársskiftið 1984/1985 harra formaður, tá lá javnvágin millum fíggjarskyldiu og orku landsins aftur føst aftan á

olju, rentu og inflatiónkreppuna fyrst í 80'unum, tá tað brakaði í hvørjum spreki búskaparliga ikki bert í Føroyum, men um allan heim.

Útflutningsvirði Føroya undir síðsta landsstýri vaks trygt skjótari enn løgtings fíggjarlógin og tann tá júst samtykti samtíðarskatturin fekk inntøkur og eftirstøður at reka stútt í landskassan. Fiskivinnumøguleikar okkara vóru ikki fulltroyttir tá, sum teir eru nú. Tað gekst sum eftir árini 1985 búskaparliga og tað prógvar, at kreppuni høvdu vit í sístu samgongu vunnið á, áðrenn samgongan legði frá sær. Løgmaður ynskir sær sjálvum til lukku við orðunum merkisvert at so stórur partur av politisku stevnuni hjá hesum landsstýri kundi innast í verki.

Nei harra formaður. Einki merkisvert liggur í stórum almennum virksemi, sum jú er politiska stevnan hjá vinstrahallum, bara teir vilja tríva nóg djúpt niður í lumman hjá fólki og rippa vinnulív og uppsparing fyri alla lívsmegi. Løgtingsfíggjarlógin er hækkað eitt túsund mió.kr. síðan 1984, meðan útflutningsvirðið hevur staðið í stað síðan 1985. 1986 var fyrsta árið í Føroya nýggjaru søgu, at fíggjarlóg løgtingsins fór upp um útflutningsvirðið, og síðani er munurin øktur tann skeiva vegin við 200 mió.kr. árliga. Løgmaður sigur, at gjaldjavnahallið 1988 verður framroknað til 700 mió.kr.. Í fjør var gjaldjavnahallið kunstiga lágt, tí sølan av farmaskipum, útlendsk veðhaldstap og norskur rentustuðul vóru inntøkuførd við 650 mió.kr. Uttanlandsskuldin sá tí minni út, tað er sum at selja sær hús, virki og amboð við tapi, tá skylda sparikassi og banka tað minni og so halda seg verða betri fyri fíggjarliga. Við árslok í ár verður uttanlandsskuldin 4,6 mia.kr. og løgmaður gratulerar seg sjálvan eins og fíggjarmálaráharrin, tí skuldin bert, sum tikið verður til, er økt 1500 mió.kr. í 4 ár, tí verri siga tey meira enn vónað, men kortini einar 1 túsund til 1500 mió.kr. minni, enn roknað varð við í 1984.

Tað er einki at reypa av harra formaður, tá ein hevur í huga, at undir hesum landsstýrið er vit spard 350 mió.kr. í uttanlandsskuld av kursvinningi. Fylgiskjølini prógva, at kursbroytingar eru høvuðsorsøkina til ta seinni økjandi uttanlandsskuldina

og so siggja vit butur frá kursbroytingum 1981-1984 til tað verra, 1985-88 til tað betra, ja, so eru uttanlandslán okkara økt 450 mió.kr. minni enn, tað sær út til undir hesi samgongu, og tað er hóast alt høpisleyst, at spáa um eina skuld 4 ár fram í tíðina, sum menn gjørdu í 1984, tá væntaðu teir, at dollarin skuldi hækka úr 12 kr. upp í 24 kr., at oljuprísurin skuldi hækka upp í tað dupulta av tí, hann var hækkaður, at 12 nýggj farmaskip skuldu verða bygd og keypt árliga, ella danska krónan fall. Nei, slíkar framskrivingar eru tað bera git, tað vóru tær tá og tað eru tær nú, veruleikin talar sítt týðuliga mál . henda samgongan hevur í 4 ár tikið eina hálva mia.kr. fleiri í lánum uttanlands, enn undanfarna samgonga tók.

Harra formaður. Í røðuni hjá løgmanni detta vit um orið lønarvøkstur, tað er rætt at 16% øking hevur verið í lønútgjalding farna árið við bert 5% innflatión, men lat tað standa fast, at eingin fær ein reallønarvøkstur í orðsins sonnu merking, fyrr enn tær 15.000 kr. árliga í meira kostnað í eykatolli pr. húsarhald og tapini frá óteljandi verkføllum hesi seinasti 4 árini eru íroknað inntøkustøðuni hjá tí einstaka. Vit gloyma heldur ikki, at útflutningsvinnan í fjør betalti 1% minni og heimavinnan 13% meira í lønum. Av sonnum er tað ein gongd á skeiva borið, burtur frá landsinntøku og yvir til nýtslu. 400-500 nýggj almenn størv eru sett á stovn, tað nátti verið rættari av hesum landsstýri, at sett nøkur størv færri og goldið eina ordiliga løn fyri tey, so óneyðugt var við øllum verkføllunum og so samfelagið slapp undan hesum arbeiðssteðgunum og fíggjarmissinum.

Tá løgmaður erpar sær av avlopi í landskassaroknskapinum, so er tað rætt, at fyrstu trý árini av hesum valskeiði hevði landskassin ein góðan likviditet, fyrst av samtíðarskatti og inngoldnum skattaeftirstøðum, og síðan vórðu 200 mió.kr. árliga álíknaðar fólki í eyka avgjøldum.

Stórt byggivirksemi gav góðar inntøkur eisini í landskassan, men eitt hart varskó ropti ráðleggingarnevndin nú í mai av tí, at almenna oyðsli í seinastuni endar við einum landskassahalli í 1988. At hugsa sær til alment undirskot

høast fíggjarlógin er pumpað úr 1400 mió.kr. í 1984 upp í 2400 mió.kr. í ár, meðan útflutningsvirðið framvegis liggir niðan fyri tær 1900 mió.kr., har tað lá fyri 4 árum síðan.

Tey falnu veðhaldini, sum landskassin hevur lagt út eru bara ein dropi í havinum av tí, sum hitt almenna kostar meir at reka í dag enn í 1984, uttan at inntøkuorka samfelagsins er økt eitt vet frá útflutninginum.

Nú eru tey mest hóttandi veðhaldini tey, sum stava frá garvillum feilíløgum undir hesum landsstýrinum í virki og skip fyri hundraðtals mió.kr., sum alt liggur stongt og bundið við kei, sosialistisk sandkassaprojekt tey allar flestu.

Longu ovast á fyrstu síðu og fleiri ferðir seinni í røðuni birtir løgmaður upp undir øvundakensluna í teim vinstrahallu við endurtøkum av orðum sum spekulatión, spekulantar, útholan av skipanini, mísnýtsla av rentutílskrivingini o.s.fr. og endamálið er sum vant nú uppundir val at sáa illgrunaseni, sosialisman byggir jú á øvund, so at landsstýri, fær eina undanførslu til at leggja eftir t.d.s. vinningi av húsasølum og serliga at leggja eftir uppsparingini við at skatta rentuna harðari. Hetta er gamal lógvaskriði hjá hesi samgongu.

Vit minnast lógauppskotið í 1982 frá javnaðinum um at hækka rentuskattin, tí hesir fýrarnir orka ikki at siggja eitt oyra í privatogn hjá fólki uttan at skula kradda tað til sín, teir gevast ikki, fyrr enn eingin eigir so frætt sum eina óskattaða sparikassabók eftir, og heilt galið vænti eg, at tað verður um Hilmar Kass ger av ikki at stilla uppaftur og ikki blívur valdur.

Í løgmansrøðuni eigur fiskivinnan, sum fyrr var høvuðsvinnan í samfelagnum, bara eina einastu blaðsíðu av 21, ei dáni í at hon er krógvað burtur, lítið er at vísa á harra formaður og fáir glottar at hóma. Russar fáa meira svartkjaft, meðan vit bara draga svart eystanfyri. Saltfiskalinubátarnir eiga hvørki kvotu ella fong. Laksabátunum sendi Tjóðveldið donsku sjóverjuna út um mark eftir sum 200 fjórðinga markið var eitt slag av mariotimum berlinmúri. Heimaflotin gongur í trongri rúmi fyri hvønn dag og eigur 300 av teimum gott 400 mió.kr., sum fiskiflotin hevur drigið upp á seg í

rakstrarskuld tey farnu 4 árini, nótaskipini fáa tað ikki at bera til, svartkjaftaskipini eru ein vanlukka fyri eigarar, manning og samfelag, alt liggur bundið við kei, og tað er so kanska tað mest sjónska fruktin av 4 árum við sosialismu.

111 skip hava søkt um kreppulán harra formaður, og játtanin til fiskivinnuna í løgtingsfiggjarlógini í ár er hægri enn nakran tíð fyrr. Burtursæð frá 50 hýrum á íðnaðar-og 160 hýrum á saltfiska-og flakaskipunum eru allir manningapartar í fjør lægri enn, teir vóru í 1984, og sama inntøkufall hava útróðrarmenn upplivað. Á stóru ísfiskatrolarunum er frá 1984-1987 manningarparturin fallin úr 230 niður í 179.000 kr., á smærri ísfiskatrolarum er fallið úr 208 niður í 170.000 kr.. Minnist til, at hetta er yvir 4 ár, ísfiskalínuskipunum úr 174.000 niður í 170.000 kr. væl sloppi á nótaskipunum úr ð 253.000 niður í 141.000 kr. á rækjuskipunum úr 253.000 niður í 182.000 kr., á saltfiskalínuskipunum úr 174.000 niður í 54.000 kr., tað er ein rein katastrofa, á hemara-og svartkalvalínuskipunum úr 108.000 niður í 79.000 kr. og tá er eingin prisvøkstur hesi 4 árini yvirhøvur roknaður inn. Og sammett við lønarvøksturin á landi fullu hýrurnar 35% frá 1986 til 1987.

Hetta er m.a. landsstýrisins verk og viðhvørt hava vit hoyrt melið í teirra formanni í Føroya Fiskimannafelag, men tað hevur ikki verið fyri at mótmælt hesari mishandling av føroyskum sjómonnum, men bara fyri at ilnast inn á Fólkaflokkin at skelkja og gálva eftir honum aftan fyri hús og horn.

Fiskiflotin er 400 mió.kr. djúpari í skuld nú enn, hann var í 85 samstundis, sum løgmaður ikki kann vísa á nakað nýtt skip í hesum valskeiði, sum hevur ein líkinda kjans, ja, kanska okkurt rækjuskipið t.d. undantikin og so tosa teir um, at her er ikki kreppa, 150 mió.kr skeyt Fólkaflokkurin upp og tingið samtykti til kreppulán 120 mió.kr. aftrat skjeyt Fólkaflokkurin upp og tingið samtykti til prísiskoyti. Men samgongan játtaði so landsstýrinum ov fríar teymar til at ráða yvir hesum peningi. Nei, harra formaður, einki er tað burtur við at tosa um kreppu og tað djúptgangandi og tá als ikki fyri sportsins skuld, hetta er nógv álvarsligari

enn so. Víst er hetta samfelagið í kreppu høvuðsvinnan er snøgt sagt í andaleypi og tað átti løgmaður sum fiskivinnuráðharri at vita tá hann so sigur, at ongar duldar ætlanir eru at sosialisera vinnulívið ja, so kemst tað kanska av, at einki landssýri hevur sum hetta brent fingrarnar av tí høpisleysu og skaðiligu uppílegging í vinnulívið á sjógvi og landi sum hesi 4 árini.

Men er tað í sjálvum sær ikki sosialisering at hava økt almenna rakstrarkostnaðin 1.000 mió.kr., meðan inntøku orkan hjá høvuðsvinnuni er økt við 0 kr.. Sosialisering liggur í tí at brandskatta og tolla framleiðslvirðið og arbeiðsinsats, og nú eisini við einum momsi, sum løgmaður hóttir við.

Herferðin hjá landsstýrinum móti eftirlønartrygging hjá arbeiðsmonnum í Havn og stovnsseting av og so má man telja bókstavirnar samhaldsføstuarbeiðsmarknaðar- eftirlønarskipan orið í sær sjálvum er líka ræðuligt sum skipanin sjálv, prógva, at landsstýrið er meira áhugað í at hækka skattaloftið úr verandi 50% upp í 56% og at leggja hald á uppsparing við einum vánaligum eftirgjaldsvirkningi enn í einum pengatryggum aldurdómi hjá Føroya fólki.

Nú skal útflutningsvirðið eisini haldleggjast, tað eitur so snilt prísískoyti til søluliðið, men tað merkir, at tá verður stuðul latin framleiðsluni í staðin fyri avreiðingini, og úrslitið verður, at studningurin og ikki marknaðarprísurin á fiskasløgum avger, hvat verður framleitt. Júst sum svartkjaftúrdráttirnir, sum hava kostað 10tals mió.kr. í studningi, 50 kr. fyri kg. av framleiddum svartkjafti í studningi og sum nú liggur á goymslu tí ongin krabbi vil keypa, men kann landsstýrið bróta seg inn á fiskasøluna í gjøgnum bakdyrnar ja so sleppa sosialistisku planleggjararnir at dusa sær í 1900 mió.kr. aftrat í útflutningsvirðið.

Nú er landsstýrið ikki longur nøgt við, at fiskiflotin siglir seg longur og longur út í skuld, nei, nú skulu fiskavirkini á landi eisini bløða ólógliga, álegði teimum 30-40 mió.kr. í avgjaldi, so virkini skulu missa evnini til sjálvsfíggjan, at eisini tey skulu standa í kø úti í Tinganesi. Harra formaður. Eg siggi, at tíðin er farin, men eg komi aftur í seinna

umfari. Takk fyri.

Heini O. Heinesen (ff)

Harra formaður.

Eitt afturvendandi mál er løgmansrøðan ella rættari sagt ein frágreiðing frá sitandi landsstýri, tí her eru øll málsøki viðgjørd eisini tey, sum Tjóðveldisflokkurin umsitur í Tinganesi.

Sum samgongumaður á tingi fari eg at gera hesi røðu tað umrøðu, sum hon hevur uppibor-. ið.

Tjóðveldisflokkurin var við at skipa hesa samgongu, hesa 4 flokkaðu samgongu fyri skjótt 4 árum síðani, Javnaðarflokkurin við 8 tingmonnum, Tjóðveldisflokkurin við 6, Sjálvstýrisflokkurin við 2 og Kristiligi fólkaflokkurin við 2 tingmonnum. Men tá landsstýrismaðurin skuldi útnevnast fyri teir kristiligu, fór hesin flokkur í tvíningar, tí teir kundu ikki semjast um, hvør hesin skuldi verða. Adolf Hansen, sum var formaður í flokkinum, var við til at tilevna samgonuskjalið, men sum sagt, tá landsstýrismaðurin skuldi veljast gjørdist so mikil bardagi, at flokkurin fór í tvíningar, og Adolf Hansen stovnaði nýggjan flokk, Framsóknarflokkin. Tordur Niclasen yvirtók so rolluna hjá Adolf Hansen og kom við í samgonguna. Við sínum landsstýrismanni, men tað skuldi skjótt vísa seg, at hesir báðir vóru ikki stovureinir, og fóru at briksla sínum samgongumonnum heiðinskap á sama hátt sum stavnamaður fólkafloksins hevur gjørt í Dagblaðnum í fleiri ár bert fyri at fáa sær politiskan vinning. Eg vóni, at føroyingar eru so mikið at sær komnir, at teir hava gjøgnumskoðað henda óhugnaliga sjónleik.

Tað, sum eg serliga ætlaði mær at viðgera, nú hetta valskeiðið er komið at enda, er tað samgonguskjal, sum skrívað varð fyri skjótt 4 árum síðani, hvussu nógv er framt av hesum setningi, sum samgongan setti sær fyri, tá hon fór til verka.

Erlendur Patursson, sum undirskrivaði vegna Tjóðveldisflokkin, segði tá, at hetta var tað besta samgonguskjalið, hann hevði verið við til at gera, um hetta kundi fremjast í verki, so var vunnið langt á sjálvstýrisleið.

Løgmaður sigur nakað soleiðis fyrst í røðu sínari: "Nú valskeiðið er nærum runnið, kann ásannast, at sjálvdan er so stórur partur av einum samgonguskjali vorðin

veruleiki sum hesaferð.

Nú skal eg ikki verða tann fyrsti, at so ikki er. Trupulleikin í okkara figgjarviðurskiftum, tá henda samgonga varð skipað, var tann skjótt vaksandi uttanlandsskuldin. Sagt varð av undanfarna løgmanni, at hetta vóru sera gevandi íløgur, sum tá vóru gjørdar, men tað skuldi skjótt vísa seg, at støðan var munandi verri, enn roknað var við. Eg kann minnast, at hann segði í eini útvarpssamrøðu, tá eitt av teimum fyrstu kemikaliutangaskipunum kom, at her var eingin vandi, tí skipini kundu seljast fyri tað dupultа, sum tey kostaðu at byggja. Um teir menn, sum tá settu pening í, trúðu Paula Ellefsen, táverandi løgmanni, vil eg siga, at teir vóru tiknir við nøsini og alt tað føroyska samfelagið.

Eg skal nú taka nøkur brot úr samgonguskjalinum við formansins loyvi.

Stevna samgongunar er at leggja búskapin so til rættis, at størst møgulig varandi tjóðarúrtøka fæst burtur úr náttúrgivna ríkidømunum, at hava vinnu fyri allar vinnuførar hendur, møguleikar landsstýrisins at fremja eina verulíga búskaparstýring verða útbygdir. Lógin um búskaparráð verður endurskoða. Miðað verður í móti at legga partar av hesum virksemi til landsbankan, tá hesin fer at virka.

Løgd verður ein 4 ára íløguætlan, sum í høvuðsheitum strikar upp týdningarmestu íløgurnar í hesum árinum bæði almennar og vinnuligar.

Nú kann ein freistast til at spyrja, hvussu nógv av hesum setningi er framdur. Landsbankin er byrjaður at virka, búskapardeildin er endurskipað, men tað, sum var mest umráðandi fyri 4 árum síðani, var sjálvandi ein 4-ára íløguætlan, hon er ikki komin enn.

Andstøðan á tingi hevur sagt, at samgongan skal hava drípið íløguhugin hjá vinnulívsmonnunum. Eg vil halda, at tað hevði ikki gjørt nakað, um hesin hugur var nakað minni. Eg nevndi hetta í einari røðu her í tinginum fyri 3 árum síðani, tá mundi eg verðið sundurskræddur av sambands- og fólkafloksmonnum. Teir komu kropp av kroppi at gera viðmerkingar til tey fáu orðini, men støðan í dag er tann, at vit hava gjørt ov stórar íløgur, ja sera ívasamar íløgur, sum kosta hundraðtals milliónir og hvat er úrslitið?

Í fyrsta lagi hava vit ikki nakra arbeiðsmegi at seta í tey arbeiðspláss, hesar íløgur skapa, og tí er neyðugt at

innflyta arbeiðsmegi, sum er sera dýr fyri tann føroyska búskapin.

Í øðrum lagi so veðheldur landskassin fyri ein alt ov stóran part av hesum íløgum og alt ov ofta gerast hesi veðhald effektiv og hvør skal gjalda? Jú, rokningin verður send út til tann føroyska skattaborgaran í formi av skatti ella tolli.

Og so stendur skrivað í samgonguskjalinum undir fiskivinnumálum:" Fiskivinnupolitikkurin tekur grundstøðið í tí livandi ríkidømi, ið finst innan fyri føroyska fiskimarkið soleiðis, at hetta verður troytt á hin skynsamisligasta og mest lønandi hátt. Skilagóð stovnsrøkt at tryggja, at hetta ríkidømið støðugt kann endurnýggja seg sjálvt. Neyðugt verður at varðveita fiest møgulig fiskirættindi á øðrum leiðum og verður hetta gjørt við sáttmála við onnur lond", og so kemur tað:"Íløgur til fiskiveiðu á øðrum leiðum mugu bert fremjast í neyðugum samsvari við teir langtíðarmøguleikar, hesir sáttmálar goyma. Meginreglan í endurnýggingarpolitikkinum er, at veiðiorkan til teir mest troyttu garnfiskastovnarnar er nóg stór og verður tí veiðiorka at taka burturúr so hvørt, nýggj kemur afturat. Íløgur til nýggjar veiður, nýggjar leiðir ella troytan av lítið veiddum fiskasløgum verða at meta, av frægast møguligum sakkunnleika".

Nú er tað soleiðis, at tað er løgmaður sjálvur, sum umsitur fiskivinnumál í Tinganesi. Hetta skuldi verið tað største málsøkið í einum landi, sum hevur fiskivinnu sum høvuðsvinnu. Eftir míni meting, er hetta tað málsøkið, har minst hevur verið gingið eftir samgonguskjalinum, ja, ein kann freistast til at siga, at her hevur verið arbeitt í móti tí, sum niðurfelt er í samgonguskjalið, men tað skuldi verið langt frá mær at givið løgmanni alla skuldina fyri, at so er. Her má øll samgongan standa til svars fyri tað, sum fram er farið. Serliga teir, sum hava roynt at drigið sær politiskan vinning av møguligum skipasáttmálum.

Eg kundí gott hugsað mær at fingið at vita, hvør tann sakkunnleiki er, sum nevndur er í samgonguskjalinum, har tað stendur soleiðis, eg endurtaki: "Íløgur til nýggjar veiður, nýggjar leiðir ella troytan av lítið veiddum fiskasløgum verða at meta av frægast møguligum sakkunnleika.

Tað er sjálvandi beint at satsa í einum landi, sum hevur fiskivinnu sum høvuðsvinnu, men máti skal verða við øllum. Tí allir skilamenn vistu fyri trimum árum síðani, at tað fór at tróta arbeiðsmegi bæði á sjógvi og landi, um íløgurnar ikki vórðu tálmaðar nakað.

Tá talan er um sakkunnleikan, er taðíkki teir, sum seta tølini niður á pappírið til politikararnar at taka støðu út frá, ráðgevingarfeløg, grannskoðanarfeløg og fíggjanarstovnar og sjálvandi skal hann, sum leggur navn til, trúgva tí, sum skrivað stendur.

Sjálvandi eru nakrar avmarkingar gjørdar við tað, at lógin um stuðul til skipabygging er broytt soleiðis, at stuðulin er minkaður nakað og veðhaldið er komið niður á 5% við síðustillaðum bankaveðhaldi upp á 5%. Hetta skuldi so helst gjørt tað, at tað var meira skil á teimum sáttmálum, sum komu ígjøgnum. Men tað er vandi í hvørji vælferð, tí broytingin í lógini skuldi helst ikki gjørt tað, at fiskimenn sjálvir ikki hava møguleika at ogna sær skip.

Undir handverk og íðnað finna vit hesi skilagóðu orð í samgonguskjalinum: "Í almennu fyrisitíngini verður skipað teknisk deild ella sáttmáladeild at hava eftirlit við og luttaka í gerð av skipabyggisáttmálum, sum hitt almenna luttekur í. Eisini skal deildin verða føroysku skipasmiðjunum til hjálpar við útvegan og gerð av sáttmálum, møguligari samskipan av innkeypi av byggitilfari og virksemi annars.

Spurningurin um eginpening í skipum verður tikin upp fyri tí fyri eyga at fáa størri samsvar í millum reglur og praksis".

Omanfyri nevndu lógir, trúgvi eg, eru svarið upp á spurningin um sakkunnleika. Hvat nyttar at skriva so skilagóð orð í samgonguskjalið og ikki koma í tingið við hesum lógum, fyrr enn 3 ár eru farin av samgonguskeiðnum, t.v.s. at her er farið fram á sama hátt, sum í undanfarnum samgongum. Lógin um sáttmáladeild kom ikki niðan í tingið, fyrr enn í vár, og tá vóru longu hundraðtals milliónir íløgur gjørdar í sera ivasom skipaprojekt. Tá lógaruppskotið kom niðan í tingið, var tað eftir míni meting sera tannleyst. Málið varð beint í íðnaðarnevndina, har eg sjálvur eri formaður.

Undir nevndarviðgerðini mælti eg til at broyta endamálsgeinina. Hetta broyt-

ingaruppskot fall við tað, at bert Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin atkvøddu fyri. Tað, sum eg halði vera sera løgið er, at Hilmar Kass ikki atkvøddi fyri hesi broyting, tí hann hevur ikki tosað um annað enn, at gera íløgur við ábyrgd. Landsstýrisuppskotið varð samtykt og her atkvøddi ein partur av Fólkaflokkinum, so tannleyst mundi vera.

Broytingin í veðhaldslógni er heldur ikki komin í tingið fyrr enn í vár. Har atkvøddi bert samgongan fyri.

So er tað skattur og tollur. Tað er eitt mál, sum Tjóðveldisflokkurin hevur umsitið í Tinganesi. Her eru tær flestur broytingarnar framdar nokk so tíðliga í samgonguskeiðnum.

Eftir samgonguskjalinum skuldi barnafrádrátturin í landsskattinum hækkast, men hetta er í staðin blivið til barnastuðul, barnafrádrátturin er avtikin og tað hugsi eg var bara tann munurin, at tað skuldi verða landsstýrismaðurin í almannamálum, sum bar uppskotið niðan í staðin fyri landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Eg ætlaði mær at gera nakrar fáa viðmerkingar til tað, sum fram er komið her. Nú er tað serliga Jógvan Sundstein, sum eg beit merki í, hann tosaði um tað sama, sum Óli Breckmann, tað var hetta her, sum teir kalla fyri kursvinning. Fyri tað fyrsta so stendur tað á fyrstu síðu í Dagblaðnum í dag, har stendur, at kursvinningurin hjá hesi samgongu, hann hevur verið 800 mió.kr.. So kemur Jógvan Sundstein upp her og tosar um ein kursvinning upp á 250 mió.kr. og so kemur sami maður, sum hevur skrivað Dagblaðið í gjár, ella nær hann skrivaði tað, upp higar og tosar um ein kursvinning upp á 350 mió.kr., so eg trúgvi næstan, at tað er javnt við 0, hasin kursvinningurin.

So tosa teir um, at tað eru 500 arbeiðspláss sett afturat, stendur á fyrstu síðu í Dagblaðnum, tað er Dagblaðið í gjár ella í dag, haldi eg tað er. So kemur Óli Breckmann upp higar seinnapartin og tosar um 400 arbeiðspláss, so eg trúgvi næstan hatta har verður næstan sum við kálvinum, hann minkaði til ein hund.
Takk fyri.

Olaf Olsen (ff)

Harra formaður.

Eg skal gera nakrar viðmerkingar ti røðuna hjá

løgmanni og tað verður til nøkur ávís mál.

Hon byrjar við, at tað er sjáldsama stórur partur av samgonguskjalinum, sum er vorðin veruleiki.

Tey mál, sum hava staðið í skjalinum, munnu hava verið serliga konstnaðarmikil, tí aldri hevur útreiðsluvøksturin verið so ógvusligur, og tað verður sagt víðari, at høvuðstrupulleikin er tær ov stóru íløgurnar í føroyskum búskapi í dag. Tað er ikki givið, at stórar íløgur, eru ein stórur trupulleiki, men eru tað skeivar íløgur, so kunnu tær hava ringa ávirkan á búskapin.

Tað er gjørt ov lítið frá almennari síðu til at bøta um tær ringu fylgjurnar av teimum vánaligu íløgunum.

Landskassin hevur mist nógvan pening. Tey, sum hava átt eginpeningin, hava mist hann, og onnur, sum hava figgjað, tað eru mest útlendskar fyritøkur, hava mist munandi.

Eftir stendur samfelagið við mistum vinnutólum, mistum almennum peningi og útbløddum privatpersónum, sum løgmaður tekur til.

Spell var, at samgongan ikki gjørdi nakað at bjarga tólunum á føroyskum hondum, men farið er farið, og hvør er tann, sum torir at leggja til brots aftur?.

Tað sær út, sum løgmaður talar bert um útbløddar privatpersónar í svartkjaftavinnuni. Sátt er vist tað, at her hava fleiri bløtt nógv, men innan farmavinnuna hava fólk mist nógvan pening eisini. Mær dámar nú ikki at nýta orðingina "at bløða pening", sjálvt um løgmaður nýtir hana, tí tað er hóast alt langt í millum blóð og pening í hesum sambandi.

Tað er eisini innan aðrar partar av vinnuni, har nógv er mist. Tað munnu ikki vera so fá, sum hava selt skip við tapi í seinastuni.

Løgmaður talar eisini um, at vanlig flakavinna hevur ikki livilíkindi longur, men hann er helst fultvitandi um, at tað eru fleiri virkir, sum hava lagt seg eftir øðrum enn vanligari flakavinnu, sum heldur ikki hava havt góð livilíkindi fyri at siga tað milt, so løgmaður má ansa eftir, at hann ikki ræður til at sleppa tí dagliga yrkinum, áðrenn hann hevur sæð okkurt annað, sum veruliga hevur bein at standa á.

Men løgmaður sigur, at flestu skipabólkar sýna frægari úrslit fyri 1987 enn fyri árið frammanundan, og at umsóknirnar um serlán prógva eisini, at tað ikki er so galið, sum summir prestar prædika. Hann sigur eisini, at tað eru politikarar og bløð, sum hava tikið sær rættin til at definera, at Føroyar eru í einari djúptgangandi kreppu.

Eg ætli mær ikki at lasta løgmann fyri tað, sum hann ikki er at lasta fyri, og hann her sjálvandi ikki at lasta í øllum, hann eigur enntá rós fyri mangt, men hvar er løgmaður, um politikarar og bløð ikki skulu hava rætt til at gera sær sínar metingar av samfelagnum? Ætlar hann, at tað skulu verða nøkur útvald til at gera tað? Og hvør skal siga, hvørji tey eru? Hevur løgmaður og hansara viðhaldsfólk ikki eisini bæði rætt og umstøður til at definera kreppu ella ikki kreppu, ella hvat annað tað skal vera? Um løgmaður meinar hetta, sum hann sigur í røðu síni, so er ikki nógv demokrati eftir í honum, ella er tað tað, at hann nýtir orðingar, sum eru lættar at misfata?

Kreppa ella ikki kreppa, tað er væl tølini, ið skulu tala, og tølini eru og tey eru fyrst og fremst til løgmann og síðani fyri okkum onnur.

Vit løgdu tøl á tingborð í vár, sum sýndu, hvønn veg tað ber, og tann myndin teknar ikki eina ljósa mynd av, sum løgmaður sigur, flestu skipabólkunum, men avgjørt eina dapra, og tá eru teir bólkarnir, sum ringast eru fyri, ikki við, t.d. tann bólkurin, har løgmaður sigur, at nógvir eru útbløddir. Hesi tøl, vit løgdu fram, vóru ikki tøl, sum vit tóku úr egnum brósti, men útrokningar, sum løgmaður í sínari tíð sjálvur skipaði fyri at fáa gjørdar og sum so vítt eg veit, hann eisini hevur havt stóran áhuga fyri. Her nýtist eingin definitión, her er bert at siggja og lesa. Gott hevði verið at fingið hesi tølini førd fram til í ár og munnu tey fara at koma skjótt, tað hevði verið gott, um so var.

Løgmaður sigur eisini, at enn eru fiskiskip lívsgrundarlagið og vit mugu ikki skerja íløguhugin so nógv, at ikki nýroyndir verða framdar, tær eiga lívið í okkum, eisini tær váðiligu og lutvist miseydnaðu, og her eru eg púra samdur við løgmann.

Eg vænti ikki, at tað verður stórt lættari at reka fiskiskip í framtíðini, so um

tað verður minkað munandi um fíggingarmøguleikarnar, so verður tað ikki so, at færri skip verða umbiðin, men eingi.

Sum løgmaður sigur:"Árædið er linkað, mátturin og peningaorkan ganga undan."Ja, tað er er ikki vegurin at møða øll niður, so eingin orkar nakað.

Løgmaður nevnir alivinnuna og sigur, at henni hava bakkøst verið fyri og at trupulleikar eru við at innflyta fóður og at goyma tað og annað. Hetta er púra rætt, vit eiga at gera alt, sum gerast kann fyri at framleiða fóður sjálvir.

Alivinnan, hon er í menning um allan heim. Tað kundi hugsast, at tað verður so nógvur fiskur aldur, at prísurin verður so lágur, at bara fáir klára at framleiða, men tað vænti eg nú ikki. Málið hjá teimum stóru alaralondunum er at náa upp á 10 mió. tons av aldum fiski um fá ár, also um árið.

Vit vita, at umleið 90 mió.kr. tons av fiski verða veidd um allan heim um árið og vit vita eisini, at 7 kg av fiski fara til fóður fyri at ala 1 kg av tí dýrasta fiskinum og um 3 kg til 1 kg av tí bíligasta fiskinum at ala í fóður, og um tað so í miðal fara 5 kg av fiski til fóður fyri at fáa 1 kg av aldum fiski, so skulu nýtast 50 mió. tons av fiski til fóður fyri at framleiða tey 10 mió. tonsini, sum londini hava sett sær fyri at ala og tað er meira enn helvtin av øllum fiski, sum verður fiskaður, eisini alifiski iroknaðum. Av hesum siggja vit, at ein stórur partur av tí fiski, sum veiddur verður, skal nýtast aftur sum fóður og hetta merkir, at tey lond ella øki, sum hava góða atgongd til fóðurfisk, verða tey, sum koma at hava møguleikarnar fyri at ala nógv.

Eg haldi, at eftir hesum, áttu vit at ligið millum tey, sum hava møguleikar fyri at fáa nakað burtur úr alinginí í framtíðini, men tað krevur, at vit gera nakað við at leggja so til rættis, at vit hava fóðurið til taks.

Løgmaður nevnir, at í dag ber til at lána pening til uppsparing og at hetta vindir meira og meira upp á seg og tað hevur óhepnar fylgjur fyri onnur, sum lána til meira neyðug endamál. Um hetta veruliga er so, so eigur avmarking at verða sett í verk, so at hetta ikki kann misnýtast, tað ber til at gera og sjálvandi eiga vit ikki at oyðileggja eina skipan, sum hevur verið samfelagnum at gagni

við ikki at gera nakað fyrí at verja hana, um hon eitt stytri tíðarbil er í vanda.

Eisini sigur løgmaður, at ikki slepst undan at toyggja íløguynskini fram eftir frá frá 5-6 árum til eini 8-10 ár og tað má verða vinnulívsíløgurnar, sum mugu prioriterast fremst. Jú, tað er ikki undarligt, at tá ið samgongan hevur gjørt ótálmaðar íløgur í óproduktiv endamál, so má tað einaferð haldast upp at við tí, og tað heldur løgmaður er hóskandi at gevast við, nú landsstýrisskeiðið er at enda komið. Helður hann ikki fram í næsta, so passaði tað honum kanska væl at hava nýtt nógvan pening nú, tá tað av somu orsøk ikki verður ráð til tað í fyrstu framtíð.

Undir íðnaðarmálum nevndir løgmaður, at vit liva í eini spekulatiónstíð og við einum avskeplaðum lønarlagi. Um virkjunum skal verða lív lagað, so verður neyðugt at bøta um arbeiðsumstøður, fækka talið av arbeiðsfólki og rationalisera, effektivisera og kappast.

Ja, soleiðis má tað helst verða. Men gott hevði verið, um løgmaður hevði gjørt nakað við spekulatiónina og avskeplaða lønarlagið, áðrenn hann endaði skeiðið og ikki eisini goymir teir trupulleikarnar til teir, sum skulu koma eftir hann.

Fýra nýggjar lógir um sjóvinnumál eru samtyktar, men enn hevur landsstýrið ikki lýst tær tríggjar at koma í gildi, men sagt verður, at tað verður gjørt innan árslok. Tað er gott og væl at seta hesar lógir í gildi, men vit mugu vita, at fylgjurnar verða eitt ótal av undantøkum og dispensatiónum, sum tað var sagt av mongum tinglimum undir viðgerðini.

Um vit skulu gera okkum vónir um at hava skípini siglandi, so má hetta hugsast væl igjøgnum, hvørjar avleiðingarnar verða og laga tað soleiðis, at vit ikki standa eftir við høgum krøvum og ongum, sum lýkur tey.

Undir skattamálum stendur, at upplýsingarskylda o.a. ger, at líkningararbeiðið kann gerast munandi meira effektivt og at samtíðarskattaskipanin kemur at arbeiða rættari og tryggari fyri skattgjaldaran.

Tað er eitt, sum eg haldi, ikki verður havt nóg væl í huga og tað er, at av tí at vit nú hava fingið teldur, sum kunnu rokna og arbeiða skjótari, so kunnu vit hava meira innviklaðar lógir, tí tað klára teldurnar at greina út.

Hetta er óivað rætt, men vit mugu ikki gloyma, at jú meira fløktar lógirnar eru, jú meira fólk skal til fyri at seta seg inn í málini. Hetta ger, at upp aftur fleiri teldur skulu nýtast og upp aftur fleirí fólk at passa tær. Vit fáa eina dýrkandi umsiting bæði við útgerð og fólk og eg meti, at føroyingar skulu veruliga til at ansa eftir, at umsitingin ikki veksur okkum yvir høvdið. Tað eru onnur lond, sum longu stríðast hart í móti hesari vandamiklu gongd. Men tað, sum ikki er minni óheppið, er at skattgjaldarin missir alla kenslu av, um hann er rætt skattaður ella ikki, tí nú er tað tól, sum arbeiðir líka skjótt, sum ljósið ferðast, sum avger, hvat hann skal hava í skatt, og hann kennir seg fullkomiliga at hava mist sambandið við skipanina. Hetta er ikki bert skattgjaldarin, sum kemur at liggja ímillum, men eisini tey, sum koma undir aðrar fløktar EDV-lógir.

Landsstýrið hevur verið afturhaldandi við at geva loyvi til ótálmað lán til kommunur fyri at tálma tí yvirupphiting, sum hevur verið í byggivirkseminum á landi, sigur løgmaður. Um vit hyggja í fylgisskjølini, so síggja vit, at løngjaldingar til bygging eru øktar við umleið 110 mió.kr. í 3 ár, meðan t.d. almennar tænastur eru øktar við um 320 mió.kr. also 3 ferðir so nógv.

Eg vænti, at tey verða skuffað, sum rokna við, at um byggivirksemið verður tálmað eitt sindur, so er nógv fólk at fáa aftur til fiskiskapin og fiskivinnuna. Tað er almenna tænastan og handil o.t., sum fer við størstu økingini og valla kemur nógv fólk aftur haðani. Skulu vit halda fram á tí tænastustøði, sum vit hava nú, so skulu vit nokna við, at umstøðurnar hjá primervinnuni verða truplar viðv. manning, kanska alivinnan undantikin.

Ein fyrireikingarnevnd er sett til at fyrireika bygging av høvuðsposthúsi. Eg fari at loyva mær at spyrja Vilhelm Johannesen, landsstýrismann í ídnaðarmálum, nær hann fær høllina til framsýning av føroyskum ídnaði aftur frá postverkinum. Lasse Klein, landsstýrismaður í postmálum veit kanska nakað at svara upp á tað. Tað varð sagt okkum, at avgjørt meira enn eitt ár fór ikki at ganga, fyrr enn hon var klár aftur. Nú eru meira enn tvey ár liðin og nú er ein fyrireikingarnevnd sett, so

langt eru vit komnir. Nær verður høllin at fáa aftur?

Røðan endar við, at avmarkandi politikkurin, sum hevur verið førður, skal fasthaldast og herðast og at einki gildi er ókeypis, tí ber ikki til at lova risavøkstur í almennum tænastuveitingum.

Vinnulívið skal hava bæði botn og lok, sum liggur fast.

Um almennu tænastuveitingarnar bara økjast við tí, sum tær eru øktar við í hesum landsstýrisskeiði og líka nógv vinnuvirki fara av knóranum, sum nú, og tað er væl botnurin, sum ikki var nóg góður, so eri eg vísur í, at tað hvørki verða givin skatta- ella tollættar, men at tørvurin verður størri, enn Føroyar verða mentar at bera.

Í løgmansrøðuni á Ólavsøku 1985 stóð, at samfelagið fer at seta teimum stór krøv, sum meta seg so heppin, tí tey hava fingið stóra ogn at umsita o.s.fr., tey sluppu ikki at dansa ein isoleraðan dans um gullkálvin, nú man vera fallið á gullið og áhugin lítil at dansa hvørki ella í felag, tí tað er eftirhondini lítið at dansa um.

Løgmaður leggur stór krøv, størri enn frammanundan. Tað var einaferð ein kongur, sum lovaði, at hann skuldi leggja størri byrðar á fólkið, enn faðir hansara. Ríkið hjá honum fór í tvíningar. Løgmaður eigur at ansa eftir, at hann ikki kemur út fyri nøkrum líknandi.

Tað, sum Føroyar treingja til í dag, er minni toll og minni skatt, tí Føroyar munnu vera millum dýrastu lond í heiminum at búgva í.

Takk.

Asbjørn Joensen (sj)

Harra formaður.

Nú fari eg at taka við aftur her og umrøða eitt lítið sindur um íðnaðin, sum løgmaður førir fram í sínum skjali í samb. við løgmansrøðuna og eg má siga, at tá man hevur lisið ta crðingina, sum fyrikemur har, so fyrikemur mær eitt lítið sindur torskilt, tá ið tosað verður um, at fáa samvinnu í lag í millum ymiskar íðnaðargreinir og eg hugsi, at hann í hesum samanhangi nokk hugsar mest um fiskiíðnaðin. Tað er helst skilagott, tað ivist eg onga løtu í, meðan eg haldi, at tað, sum eitur smáíðnaður, og sum vit í sínari tíð appelleraðu nógv til her á tingi, ikki verður so væl viðgjørt. Tó skal verða sagt til hesa samgonguna, at hon eigur rós fyri og tøkkina

fyri, at hon hevur umskipað okkara tollskipan soleiðis, at hesin her íðnaðurin hevur fingið munandi betri møguleikar fyri at eksistera enn, sum hann hevði frammanundan.

Tá ið sagt verður, at umhugsað verður um útjaðaran her í landinum og at man vil royna at skipa um Menningargrunn og aðarar stuðulsgrunnar soleiðis, at møguleikin gevst, so er hetta greðilig frásøga. Vit hava jú ferð eftir ferð havt bæði uppskot og umrøðu á tingi um, hvussu vit skulu kunna geva útjaðaranum møguleika fyri at yvirliva. Men vit eiga ikki at gloyma, at vit hava sjálvir faktisk tikið tað nátúrliga grundarlagið undan útjaðaraeksistensini.

Teir livdu jú mest upp á landbúnaðin, men tann skipanin, sum vit fingu í lag, tá mitt í 70-unum, hon hevur faktisk tikið støðið undan hesum her møguleika og eg havi nevnt tað áður her, at eg dugi ikki at siggja annað enn tað, at um nøkur fá ár, so er einki grundarlag undir nøkrum formi fyrí landbúnaði úti á oyggjunum og at trúgva tí, at man kann broyta hesa her skipanina so bara vit at umskipa nakað í Menningargrunninum og øðrum, tað er ikki rætt hugsað. Men eg trúgvi, at meiningin er góð og eg vil heita á landsstýrismannin, sum fyrisitur hesi mál, um at syrgja fyri at fáa tær regionalu eindirnar til at virka soleiðis, at vit í samband við ta menningarstovuna, sum vit hava fyriskipað, virkuliga kunnu fáa eitt upplegg, sum er nýtiligt og sum kann skapa onkran møguleika fyri eksistens úti í útjaðaranum og har hugsi eg mest um tær smáu oyggjarnar.

Alivinnan fær eisini nakað av umrøðu í røðu løgmans og eg má siga, sum er, at eg vóni at hetta fer at eydnast. Vit hava loyvi til at halda saman hendur og biðja til, at hetta ikki verður eitt mistak soleiðis, at tað verður mistak nr. 5, sum gjørt er í nýggjari tíð.

Orkuútbyggingin verður eisini umrødd og her má eg siga, at løgmaður framvegis hevur henda her sama holdningin til útbyggingina hjá SEV, sum Sjálvstýrisflokkurin tekur fulla ábyrgd av. Uttan mun til, hvussu man vil leggja tað út ella ikki, so er niðurstøðan hon, at tað nokk tekniskt er møguligt at byggja út í erva, men fíggjarliga óforsvarligt. Eg haldi, at vit hava gjørt ivaleyst av óforsvarligum tiltøkum her í samfelagnum, ikki hesi seinastu fýra árini, men vit skulu fara

longur aftur, so at tað er eingin grund til at byggja upp á ta mytuna, er tað so at man fegin vil gera íløgur í erva so trúgvi eg næstan, at eg vegna norðingar kann bjóða tykkum norður higar har er nokk av hæddum har einki uttan hæddir fyri so vítt, so bara far í gongd. Men hvat viðvíkur vatnútbyggingini so tori eg eg at lova fyrí at Sjálvstýrisflokkurin altíð vil verða positivur, altíð vil bakkað upp tey projektir, sum hava skilagóðar loysnir eins og Eiðis-projektið hevði.

Eg haldi tað er rætt líkað at nema komunumal. Hettar hevur verið eitt kjak, nú í bløðunum í longri tíð, eg vil siga at eg eri ikki ósamdur við landsstýrismannin í kommunumálum um at tað er neyðugt at tálma. Tað er neyðugt at tálma íløgur bæði komunalt og landspolittiskt, men tá man so samstundist lesur um allar tær íløgurnar sum ætla at gera á landspolitiskum plani, so trýgvi eg at vit skulu líkasum fara at samskipa niðurskurðin hjá kommunum ella ætlaninar hjá landsskassanum ella landsstýrinum, men hettar her er sikkurt tað sum løgmaður umhugsar tá ið hann tosar um eitt longri skeið til útbyggingarnar. Men sum eg havi nevnt áður, at bara at nerva lántøkurnar hjá kommununum við einar 30% er ikki nokk um kommurnar fáa hesa lántøkuna hesi 70% s eftir eru av ynskinum, so eri eeg fullvísur í at hesar kommunur fara í gongd við tey ætlaðu arbeiðini um vit ikki eisini, um eg so man siga, taka fatt fysiska endan av projektinum hvar í vit hava stóran møguleika fyri at stýra byggiaktivitetinum við tað at projektini ikki fara í gongd áður enn fullfíggja fígging fyriliggur.

Rentuskatturin hevur eisini verið umrøddur, tað var vist háttvirdi tingmaður Jørgen Thomsen, sum var her og umrøddu rentuskatt, og eg tori at siga at vit frá Sjálvstýrsfloksins síðu eru positivur, tá ið tað dreyðar um at fáa inn pening av spekulatiónsskatti, men vit eru negativur í tilfeldi av at tað ikki skal bera hjá einkulta borgarinum at spara upp pening sum hann sjálvur hevur sveitt fyri. Eg trúgvi tað má kunna finnast ein loyst á hesum spurningi og øll tey tól og allat møguleikar vit hava givið stovnum, teir áttu at kunna funni fram til eina góða loysn.

Eg eri glaður fyri tað desentraliseringina sum er farin fram á skattaøkinum, tað eigur landsstýrið tøkk fyri, men vil eg samstundist gera vart við at eg aldeilis ikki nøgdur við tað endaliga úrslit

tað samlaða úrslitið, hvat desentralisering viðvíkur og eg vildi ynskt at vit vóru komnir nóg, nógv longur á tí økinum, so eg vóni at vit í minsta lagi kunnu fáa tær umrøddu oyggjardeildirnar í samband við landsverksfrøðingsstovnin upp at standa áður vit koma til valskeiðið.

Tað var onkur her sum skeyt okkum í skógvarnar ella kanska var tað Hilmari um at man hevði ein negativan holdning til sáttmalastovn, her varð nokk hugsa um skipabygging. Eg vil líka ger vart við, at uppskot um sáttmálastovn var frammi í 1973 ella var tað í 1974, tað var júst í tí tíðini tá skipasmiðjurnar vóru í kreppu og eg kann forsikra viðkomandi fyri, eg haldi tað var Heini O. Heinesen, sum nevndi hettar her, Tjóveldisflokkurin tá var minst líka negativur, sum Hilmar Kass hevur verið í seinastuni, so tað kann vist ganga líkað upp í so mátað.

Harra formaður nú fer tíðin hjá mær at styttast, eg torið at siga at í minari verð hevur hettar verið eitt skilagott samstarv, sum hevur verið í hesari samgonguni, at tað ikki hugaði ávísum, sum brutu út nú vit vóru komnir upp ímóti endanum, tað má so standa teirra, men tað líka so heppi og gott at vit fingu sjóa saman aftur, soleiðis at samgongan kundi haldað. Hóast hettar tori eg ikki at gera ómikið burturúr og prísa ov mikið nógv, tí sambært bløðini so er tað alt sum bendir á at vit til eitt komandi væl longu hava skipað samgongur um eg havi lisið rætt fram til nakað so bendir okkurt á hetta, og vónandi verða vit teir sum skulu takað dagar ímillum hvat fragast er, tað plaga vit at duga ógvuliga væl og eg skal lovað fyri at fáa vit tann neyguðan stuðulin so verður samfelagið í hvørfall ikki snýtt av okkum.

Takk fyri harra formaður.

Jóngerð Purkhús (tv.)

Harra formaður

Hetta er seinasta løgmansrøðan í hesum valskeiðnum sum er til viðgerðar ídag, so tað er natúrligt at tað er alt valskeiðið sum verður viðgjørt, men hvussu s so út tá vit yvirtóku 10. januar 1985, og lat meg fyrst takað landskassabúskapin.

Tað var eitt stórt hall á fíggjarlógini, samstundist sum teir stóru grunnarnir veðhaldsgrunnurin til at standa ímóti møguligum tapum við og grunnurín til endurnýggjan av skipaflotanum vóru negativir við

meira enn 150 mió. kr. tilsamans.

Gjaldsføri landskassans var sera vánaligt hóast at trekt varð uppá Danska Tjóbankan við umleið 75 mill kr. harafturat skiladaði landskassin eisini til teir føroysku bankarnar, tað má hava verið út ímóti 100 tals mill. tí eitt skifti var bara yvirtrekkið til Lønjavníngargrunnin millum 90 og 100 mill. Bankarnir hava verið so lagaligir at landskassin altíð hevur kunna trekt eykað og kann tað enn um tað gert neyðugt. Løgtingið hevði eisini samtykt at geva landsstýrinum loyvi at taka upp lán fyri at býta um nøkur dollar lán, sum vóru blivu ógvuliga dýr. Heldur ikki tað var møguligt at fáa íggjøgnum, tað skuldi ganga 1½ ár áðrenn vit fingu nakað lán frá útlandinum. Málið hjá hesi samgongu bleiv tí at venda øllum ninussum til plus, samstundis sum samgongan setti sær fyri at loysa ógvuliga stór mál, summi av hesum kostaði nógvan pening. Neyðugt bleiv hjá sitandi samgongu at reka ein meira konsuliderandi og avmarkandi fíggjarpolitik enn verði hevði og vøksturin í teimum fyrstu fíggjarlógunum var sera lítil samstundis sum nógvur peningur varð langdur í grunnarnar. Hettar gjørdi at undirskotið á fíggjarlógini skjótt minkaði og vendist longu í 1986 til eitt yvirskot uppá 277 mill. kr. Roknaskapurin fyri 1987 er ikki enn endaliga liðugur, men seinastu tølini vit hava fingið vísa at yvirskotið fer at liggja um einar 290 mill. kr. og tá íð egm tosi um hesi yvirskot er oljugrunnurin ikki taldur uppí, t.v.s. og herumframt eru lagðar einar 164 mill. kr. í oljugrunnin. Fyri 1988 sær soleiðis út í løtuni, at eftir teimum nýggjastu metingunum um tollinntøkurnar so fara tollinntøkurnar nøkulunda at halda, meðan væl meira er komið inn í skatti enn mett á fíggjarlógini. Tað bleiv eisini sagt at fíggjarlógin fyri 1988 varð framløgd at skattainntøkurnar vóru varisligar mettar, so fyri 1988 bendir alt á í løtuni at landskassin kann greiðar sínar skyldur og kortini fáa eitt avlop. Hesin fíggjarpolitikkur hevur verið sera heppin, tí sum øllum kunnugt eru hesi seinastu árini útgoldnar 100 tals mill. fyri fallin veðhald. vit hava klára at greitt okkara skyldur og goldin allan hendan pening, so her liggur eingin gomul rokning og biðjar. Tað kom okkum eisini væl við tá fiskivinnuni tørvaði pening, tá vit yvirtóku í 1985 var sum

sagt gjaldføri landskassans sera vánaligt, tað fyrstu tíðina var sera trupult at rinda rættstundist, hvønn mánað tá landskasin skuldi útgjalda lønir og pening til stovnarnar annars, mátti man royna at skava nakað av peningi saman og við hjálp av láni úr Danska tjóbankanum og yvirtrekk í føroyskum bankum kláraði man seg so dánt igjøgnum og vit minnast serliga væl trupuleikarnar hjá Lønjavningargrunninum, men aftaná 1½ ár fekst vend her og seinastu árini hava vit kunna svara hvørjum sínum sítt til tíðina, samstundis hava vit goldið skuldina til Danska Tjóbankan so har skylda vit einki har nú, og undirskotið í føroysku bankunum er vent til yvirskot, eisini eigur landskassin nú pening í donkum peningastovnum. Tølini eg fekk frá Gjaldstovuni ígjár um gjaldsføri landskassans vísir at í føroyskum peningastovnum stóðu umleið 150 mill. kr., men hettar er eitt tal sum svingar upp og niður, hettar er tann dagligi peningapungurin hjá Gjaldstovuni. Í donskum peningastovnum stóðu umleið 127 mill. kr. tað er tilsamans 277 mill. kr. , og pr. 1. august í ár vóru 164 mill. kr. tilsamans inngoldnar í oljugrunnin, her er nakað lánt útaftur, 40 mill til Húsalánsgrunnin, 20 mill. til Íðnaðargrunnin og 20 mill. til Menningargrunnin og restin 84 mill. kr. standa so í donskum bankum. At gjaldføri er í lagið lættir ikki einast arbeiðið, men tað sparir landskassanum 10 tals mill. kr. um árið í rentuútreiðslum, so rentuútreiðslurnar vegna gjaldsføris trupuleikarnar nú eru vendar til stórar rentuinntøkur av teimum pengum sum standa í bankunum. Av teimum pengum sum standa í sonksum peningastovnum hevur landskassin higatil í ár fingið 14. mill. kr.. eisini er lániskuldin hjá landskassanum niðurgoldin, hon er nú millum 4 og 5 hundrað mill. kr. , tann peningur, sum landskassin nú eigur í bankunum vigar nú so nøkulunda uppí móti teimum lánum sum landskassin hevur. So landskassin skyldar ikki longur nakrar pengar, og tekur man so tey lán sum landskassin hevur útístandandi, so eigur landskassin væl av peningi til góðar.

Tá vit tosa um landskassabúskapin so kunnu vit vit siga tað hevur gingið betri enn nakar hevði tora at vóna, tí her ikki bert talan um at vend er komin í, men uttan at siga ov nógv so kunnu vit siga, at hettar landsstýrisskeiðið

hava fingið skyl á landskassa-
búskapinum.
Vit skulu so hyggja at búskap-
inum sum heild. Tá hettar
landsstýrið tók við var tað
natúrligt at tað var uttan-
landsskuldin sum órógvaði.
Uttanlandskuldin var voksin
við risaferð tey undanfarni 4
árini var hon trý falda og í
januar 1985 var hon komin uppá
3 milliardir kr. Samanflættað
við vøkstrinum í uttanlanda-
skuldini er balancutrupuleik-
arnir ella javnvágtrupuleik-
arnir í okkara búskapi. T.d.
vuksu íløgurnar so ovurhonds
nógv undir undanfarnu samgongu
og vóru, tá ið vit komu til,
komnar upp á 48% av
bruttotjóðarúrtøkuni.
Gjaldsjavnahallið vaks við
risaferð og harvið
uttanlandaskuldin, men
gjaldsjavnahallið er nú minkað
ár undan ári seinastu 3 árini,
tó er eitt bakkast í ár og
uttanlandaskuldin er nú komin
upp á 4,6 milliardir. Eg segði,
tá ið fyrsta løgmansrøðan hjá
hesi samgonguni var til
viðgerðar her í tinginum, at eg
væntaði, at tað tók nógv ár at
fáa rættlag aftur í búskapin og
tað bleiv eitt knoss, men vit
áttu ikki at missa mótið, og eg
kann siga tað sama nú. Her
hevur hetta landsstýrið ikki
fingið loyst allar
trupulleikarnar, men vend er
komin í tann rætta vegin.
Greitt var jú, at tað bleiv
neyðugt at reka ein avmarkandi
búskaparpolitikk fyri at fáa
javnvág í búskapin, men vit
hava ikki stórar møguleikar at
reka búskaparpolitikk. Har eru
vit nógv skerd sammett við eitt
sjálvstøðugt land. Men eitt
amboð hava vit, og tað er at
arbeiða við yvirskotinum á
fíggjarlógini, og tað hava vit
so brúkt, ikki bert til at fáa
skil á landskassabúskapinum,
men eisini við at eitt yvirskot
á fíggjarlógini avmarkar
nýtsluna og harvið
innflutningin og hjálpir tí upp
á gjaldsjavnahallið og avmarkar
vøksturin í uttanlandaskuldini.

Hetta er, so vítt eg veit,
fyrstu ferð, at roynt hevur
verið at reka búskaparpolitikk
á henda hátt her heima hjá
okkum og í 86, tá ið
inntøkulógirnar vóru til
viðgerðar í tinginum, hoyrdu
vit andstøðuna føra fram og
eisini í minnilutaálitinum er
skrivað, at landskassanum
tørvar ikki pening, og vórðu tí
inntøkulógirnar óneyðugar, men
einki er meira skeivt enn tað.
Inntøkulógirnar vóru neyðugar,
tí tað var neyðugt at tálma
tann ovurhonds stóra vøksturin
í innflutninginum av
nýtsluvørum í 86.

Í 1985 vaks innflutningurin av nýtsluvørum næstan ikki, men í 1986 var hesin vøkstur næstan 20% og hesin peningurin, góðar 150 milliónir kr., sum inntøkulógirnar góvu, harav vóru umleið 100 milliónir í oljugrunninum, eru ikki farnar aftur í almenna nýtslu, men standa í donskum peningastovnum. Tað hevur havt ein stóran týdning fyri at bøta um javnvágina í okkara búskapi. Nú veksur nýtslan við umleið 10%, tað er kanska meira enn í okkara grannalondum, men eg haldi, at tað er ein vøkstur, vit kunnu liva við. Í løtuni halði eg, at tað eru tær stóru íløgurnar, sum eru høvuðstrupulleikin. Men her eru vit í tí hepnu støðu, um eg so má siga, at tað er bert gagnligt fyri okkara samfelag at minka um íløgurnar, tað eru fá onnur lond, sum kunnu gera tað sama, uttan t.d. at arbeiðsloysið veksur. Eg havi fleiri ferðir borið fram, og tað eru næstan 4 ár síðani fyrstu ferð, at okkara íløgur áttu at ligið um eini 30% av bruttotjóðarúrtøkuni ella knapt tað, hetta er eisini meira enn í grannalondunum, men tað er betur at vera í yvirkanti við íløgum, haldi eg í hvussu so er, og í 1984 vóru íløgurnar heilt uppi á 148% av bruttotjóðarúrtøkuni, men nú eru tær so líðandi minkaðar niður í umleið 34% og hetta rímar nøkulunda við, at um íløgurnar falla við einum 5-6% av bruttotjóðarúrtøkuni afturat, so svarar hetta til eini 300-400 milliónir kr. og hevði tá fingist nøkulunda javnvág í eisini í okkara samskifti við útheimin. Minka íløgurnar eitt sindur, so minkar virksemið í landinum nakað, men í Føroyum vil tað ikki hava arbeiðsloysi við sær, tí her trýtur arbeiðsmegi, tað hevði passað betur til føroysku arbeiðsorkuna. Men íløgur og figgjarmøguleikar eru nær tengd at hvørjum øðrum og í heila tikið møguleikarnir at reka búskaparpolitikk á peningapolitiska økinum. Okkara møguleikar at reka peningapolitikk eru smáir.

Nú er landsbankin komin so væl áleiðis, at stjórin er settur og byrjaður at virka. Vónandi ber til at bygja ein stovn upp, sum kann verða ein stór hjálp, men so leingi vit ikki eru eitt frælst land, ber ikki til at reka sjálvstøðugan peningapolitikk.

Tað hevur verið mangan ført fram, at tjóðskaparspurningurin er so at siga "out" í føroyskum politikki, tað er høgra- ella vinstrapolitikkur valið snýr

snýr seg um ella kanska okkurt annað, men soleiðis er ikki. Okkara statsrættarliga støða er tann karmur, vit skulu arbeiða innanfyri. Tí er tað fyrst og fremst tann karmur, sum má verða soleiðis, at vit fáa virkað, um nakað veruligt skal fáast burturúr.

Tann tjóðskaparligi spurningurin er fyri okkum føroyingar heldur ikki bara tann sjálvsagdi viljin at ráða okkum sjálvum í egnum landi sum fólk, sum eru uppvaksin her um leiðir vanliga vilja og sjálvandi vilja, men so við og við er sambandið eisini blivið okkum eitt búskaparligt haft um beinini, tí tær góðar 600 mió.kr. í blokkstuðulinum til Føroyar, tær eru sanniliga ikki poengið í føroyskum politikki ella avgerandi, um føroyingar hava ein góðan búskap ella ikki. Tær 600 mió.kr. frá Danmark ella hvussu vit skulu klára okkum uttan hesar pengarnar, er ikki kjarnar í okkara viðurskiftum til Danmark, sum tað so mangan hevur verið drigið fram, at tað er. 600 mió.kr. í okkara nýtímans samfelag, hvar tølini eru vaksin soleiðis, at tað snýr seg um milliardir í mongum førum, kunnu skjótt fara í millum fingrarnar, um vit ikki í okkara framkomna samfelag fáa ríkið nútímans búskaparpolitikk og hava tey neyðugu amboðini, sum eitt frælst land hevur.

Tað hevur ikki verið so aktuelt fyri føroyskar politikarar at rikið peningapolitikk sum so ella í hvussu so er avmarkandi peningapolitikk fyrr enn nú. Tað hevur næstan altíð verið trupulleikin, at ein skal skaffa sær eitt lán her ella der tíl tað ella tað endamálið og ikki sum nú, hvar tað hevur verið so ríkiligt av pengum og hvar okkara samfelag er blivið so búskaparligt sterkt, at øll vilja lána okkum pengar og tað í ógvuliga stórum nøgdum. Tað er nú vit mangla tað amboðið, sum peningapolitikkurin er.

Eg havi hesa seinastu tíðina, tá eg havi arbeitt við at loysa skattaspurningin av teimum pengum, sum føroyingar eiga í donskum pensiónsgrunnum, hugsað um, hvussu okkara ullinta statsrættarliga støða í mangar mátar hevur avskeplað menniskjuna í okkara landi.

Tá ið vit aftan á kríggið vóru eitt lutvist fátækt land og høvdu kanska ikki so nógv útbúgvið fólk og heldur ikki so væl útgjørda umsiting, so vóru møguleikar fyri at tryggja seg í Føroyum eisini smáir. Í heila tikið er grundarlagið fyri einari góðari trygging, at so mong sum møguligt eru við. Vit eru fáment, men harafturat hevur

tað verið soleiðis, her hjá okkum, at meginparturin av ella ein ógvuliga stórur partur av teimum fólkum, sum hava verið tryggjað ella goldið inn í slíkar grunnar, tey hava verið limir í útlendskum fakfelag og so eisini tí goldið inn í danskar pensiónsgunnar, t.v.s. at teir pengarnir, ið áttu at verið her heima hjá okkum í Føroyum og gjørt tað, at vit áttu at fáa eina góða trygging, teir hava ikki verið her. Teir pengarnir, sum verða spardir upp, tá fólk spara í pensiónsgrunnar og tað snýr seg um ógvuliga nógvar pengar, verða vanliga brúktir til íløgur í landinum. Í Føroyum hevur so bert ein partur av slíkum pengum virkað, meðan allir pengarnir, sum føroyingar eiga í donskum pensiónsgrunnum hava virkað í Danmark. Tað hevur verið ómøguligt at fáa at vita, hvussu nógvan pening, talan er um. Eg nevndi í eini blaðgrein herfyri, at talan mundi vera um eina góða hálva milliard, tí eg vildi ikki siga ov nógv, nú eri eg komin tað longri, at eg haldi meg ikki siga ov nógv, um eg sigi 1½ milliard. Her er tað aftur tað sama. Fyri tað fyrsta er okkara kapitalmarknaður her heima lítil og tá so stórur partur av tí uppsparda peningínum, sum í øllum hinum londunum verður brúktur til at læna út til íløgur, er uttanlands, og vit ikki fáa brúkt teir í Føroyum, so verður okkara kapitalmarknaður enn minni og enn fátækari og tí verður neyðugt, hvørja ferð, vit skulu hava eitt størri lán, at fara uttanlands. Hesar milliardirnar áttu at verið í føroyskum bankum, tær áttu at verið lantar út til kommunur, landskassan og alt tað, sum vit her í tí føroyska samfelagnum læna pengar til. Í øllum førum áttu vit at fingið upplýsingar um, hvussu stórt talið er, soleiðis at vit kundu ført statistikk yvir tølini, hetta er ein ogn hjá føroyingum og eigur at bókast sum mótpostur til uttanlandaskuld.

Hugsa vit nú okkum, at røring kemur í hesa eftir okkara umstøðum kolosalu nøgdina av pengum, t.d. at teir verða fluttir heim til Føroya ella bara ein partur av teimum og har eiga teir at verða, so man kann ikki rættiliga siga nei til tað, men hetta vísir bara eisini, hvussu lítið tað fólkavalda stýrið kann stýra peningatilgongdini í okkara samfelag. Vit eru í tí støðu nú í hvussu so er, at um tað einaferð var so, at spurningurin var, um vit kundu klára okkum fyri uttan teir donsku pengarnar, so er spurningurin nú

vendur til at siga, at vit klára okkum als ikki, uttan vit kunnu reka ein sjálvstøðugan búskaparpolitikk og har er frælsi ein fyriteyt.

Eitt annað dømi er undirgrundin. Sjálvt um løgtingið hevur viðtikið, at undirgrundin eigur yvirtakast sum føroyskt sermál og samráðingar eru tiknar upp við danir, so eru vit ikki komin longur við tí, tí har er sum Anker Jørgensen segði á sinni einki at rafla um frá danskari síðu og tað vísi seg eisini at vera støðan hjá hesari stjórnini. Her noyðast vit at bíða við. Tað er ikki bara tað, at undirgrundin er ein ogn hjá okkum og tí eigur at yvirtakast sum føroyskt sermál, men tað er eisini tað, at her liggja kanska so stórir búskaparligir spurningar goymdir, at áðrenn vit vita av, kann alt verða vent upp og niður á tí búskapi, vit kenna í Føroyum í dag, og sum er sleppa føroyingar ikki sjálvir at taka støðu.

Ikki loysir seg at gremja seg um fortíðina, men vit eiga at leggja okkum í minni og læra av fortíðini og tá ið vit nú afur fara at samráðast um undirgrundina, so er tað av allarstørsta týdningi, at minnast til søguna um heimastýrislógina, so at vit ikki aftur fara undir eina heimastýrisloysn av undirgrundini, tí tað er eingi loysn.

Ein onnur stór avbjóðing, sum liggur fyri framman, er at taka avleiðingarnar av, at felagsmarknaðurin hevur samtykt at gera ein sokallaðan innanhýsismarknað áðrenn 1992. Innan henda veldúga marknað við útvið 400 milliónum íbúgvum verður tollfrælsi, arbeiðsfrælsi, ferða- og búskaparfrælsi og peningafrælsi. Hetta kemur at seta stór krøv til øll lond, sum eru uttanfyri, eisini til okkum føroyingar. Men tá ið eg hoyvi tosað um, at tað er burturvið at tjóðveldisfólk tosa um einar frælsar Føroyar, tá øll onnur tosa um samarbeiði, so er hetta ein stór misskiljing, øll hini londini tosa um samarbeiði, men tað er millum frælsar tjóðir. Hvussu vit so venda og snara okkum, so er tjóðskaparspurningurin kjarnan í føroyskum politikki.

Ivan Johannesen eina viðmerking.

Harra formaður.

Tað er til ærøða landsstýrismann í fíggjarmálum. Tað varð sagt, at byrja við, at hallið á veðhaldsgrunni var so stórt, tá ið hendan samgongan kom til og tað fingu tey so rætta uppá, men í skjølunum her, fáa vit

at siggja, hvussu her sær út og tað er eitt skjal, sum er dagfest tann 30. juni í 88 og her stendur, at í veðhaldsgrunninum, harra formaður, her eru 292,6 mió.kr. og effektiv veðhald eru 450,3 mió.kr. ella, tað er eitt hall í hesum grunninum í dag upp á 157,7 mió. kr.

Harra formaður. Tá ið fíggjarmálaráðharrin her greiðir frá okkara fíggjarviðurskiftum, so burdi og átti alt at komið fram.

Tað var Hilmar Kass, æraði tinglimur, sum í áðni, tá ið hann var uppi her, tók hetta her fram um samtíðarskattin, hvussu ið gingist hevur á tí fíggjarliga økinum har. Tí tað var nevniliga soleiðis, at tað vóru einar 500 mió.kr., sum vóru úti, tá ið herdan her samgongan tók við, og sum hon faktisk hevur fingið sum eina eykainntøku at brúka hesa tíðina, hon hevur sitið.

Takk fyri harra formaður.

Hans Jacob Debes (tv)

Harra formaður.

Viðgerðin av hesi løgmansrøðu, sum var tann seinasta í hesum landsstýrisskeiði, má hava tann serstaka dám, sum tíðin leggur á hana.

Hvat hevur samgongan megnað at fremja, hvat ber til at fremja fyri val, og hvat verður liggjandi eftir til eina aðra samgongu, sum vit ikki kendu og helst ikki fara at kenna heilt, fyrr enn hin føroyski veljarin einaferð í heyst hevur atkvøtt aftur, men vit hava Sambandið boðið inn til nýggja samgongu, vit hava Javnaðarflokkin takkað og av tingsins røðarapalli í dag hevur so Sjálvstýrisflokkurin boðið seg til, t.v.s. at vit gleppa helst aftur í ta klassisku heimastýrissamgonguna, heimastýrisskorpiónin fer at bíta seg sjálva aftur í halan. Eingin ivi kann vera um, at roynt hevur verið sum frægast at halda samfelagnum gangandi eftir egnum fyritreytum og møguleikum, mær hevur tað ongan áhuga, hvør hevur skuld og rós. Tað, ið umræður, er at fáa samfelag okkara at vera eitt gott samfelag at liva í, at fáa ávísar tilgongdir aftur at virka, so at niðursmokkingin ikki verður ein samfelagslig náturlóg her á landi. Treytin fyri at kunna eiga hesa vón er ikki ein flytíng av einum 5 oyra frá einum borgara til ein annan. Her ræður um so nógv annað og eitt verður ið hvussu so er greiðari fyri hvønn dag, sum líður, at tað verða ikki aðrir enn føroyingar sjálvir, sum kunnu

tryggja framtíð sína. Eingir aðrir gera hetta fyri okkum, tí verður sjálvræði føroyinga ikki bert ein frómur dreymur í eina øld aftrat, men avgerandi fyritreyt fyrí framtíðarmøguleikum okkara. Her má lítast á egnan mátt og á egna megi, men ikki minst á egnan vilja. Framtíðin kann ikki bjóða okkum tann syndarliga leiklut at sita eftir sum hin seinasta tjóð í øllum heiminum, sum ræðist sjálvræði og gevur framtíð sína upp til aðrar.

Stundir verða sjálvsagt ikki hjá mær at røða um allar teir mongu spurningar, um øll tey mongu vandamál, sum liggja í meting løgmans og landsstýrismanna um støðu okkara, eg velji tí heldur at nema við nøkur mál.

Vit fáa í inngangínum til ólavssøkurøðu løgmans at vita, at tær stóru íløgurnar eru høvuðstrupulleikin í føroyskum búskapi í dag. Hetta kann illa vera annað enn ein ásannan av, at politiska skipan okkara virkar so illa, at føroyskir landsmyndugleikar noyðast at standa og hyggja at, meðan trupulleikarnir hópa seg upp uttan at hava tey politisku amboð, sum neyðug eru at stýra búskapi okkara. Men um tær stóru íløgurnar eru høvuðstrupulleikin, hví so ikki útvega sær tey amboð, sum kunnu gera henda vanda ella trupulleika minni. Sannleikin verður tó kortini tann, at hesi amboð vinnast ikki í ófrælsinum.

Ein uttanlandsskuld upp á 4600 mió.kr., framroknað til árslok, er lítið hugalig at toysta seg við, at hon kundi havt verið 1.000 ella 15.000 mió.kr. større veitir ikki stóra troyst. Tað er tó ein troyst, at undir hesum landsstýri við Tjóðveldisflokkinum varðandi av fíggjarmálum er sýndur ein heilt annar og nýggjur vilji at venda teirri hættisligu gongdini til tað frægara. Tó hongur nógv enn í leysum lofti í falnum og fallandi veðhaldum, sum eru rokningar til hin vanliga føroyska skattgjaldaran 600 mió.kr. sigast at vera lagdar út úr fólksins landskassa fyri fallin veðhald. Tí kann tað tykjast at vera nakað seint, nú í móti endanum av valskeiðnum at nevna fyribrigdi sum avmarkingar og raðfestingar og at minka íløgurnar við einum 300 mió.kr.

Eg haldi okkum hava sæð nakað lítið til framleiðslu saman við ávísum afturhaldi, sum tikið verður til á síðu 3. Tá ein høvuðsgrundin verður søgd at vera ov stórar skipaíløgur og tá hitt almenna, landið, borgar fyri so stórum parti

av hesum íløgum, hví hevur so tað almenna fyrr og nú játtað allar hesar íløgur. Ásannað verður, at fiskiskip eru tó lívsgrundarlagið, men hvat við íløgunum í fiskiskip, sum eru farin á húsagang langt áðrenn, tey fara úr bakkastokki, sovorðin skip eiga í hvussu so er ikki lívið í okkum. Rættari mátti verið at havt leitað eftir einari javnvág millum skipaíløgur og virðir av tí tilfeingi, sum hesi skip eru bygd til. Hetta eru viðmerkingar og atfinningar til ikki bert hetta landsstýrið, men til fleiri landsstýri og ikki minst til okkara, sum sita á Føroya løgtingi.

Eingin føroyingur mann vera ókunnugur um, at hin føroyska fiskivinnan er í stórum trupulleikum og tað, at fiskivinnan er í trupulleikum merkir, at alt hitt føroyska samfelagið er í trupulleikum og ikki bert ein partur av tí.

Men hvat ætla vit at gera við svartkjaftavinnuna, sum einaferð varð hildin at vera bjargingin. Tað ber ikki til bert at lata eyguni aftur og látast, sum alt gongur av tí besta, hóast tilfeingið skuldi verið nóg stórt, men so litið fæst burtur úr tí. Royndartíðin má nú vera av, og vit noyðast nú at vita, hvat ið er veruleiki, og hvat ið er óveruleiki í hesum møguleika, sum so stórar vónir einaferð vórðu settar til.

Vit mugu gera okkum sjálvum greitt, um svartkjafturin er ein handilsvøra, tá ið vit samráðast við onnur lond - ella um hann er ein rávøra (eitt tilfeingi), sum vit sjálvir kunnu fáa nakað burturúr. Hesin spurningur hevur eisini sjálvsagt samband við trýstið á okkara vanligu fiskastovnar. Men at svartkjaftaframleiðslan og svartkjaftavinnan sum heild bert kann skjóta ómegd sína aftur til søluliðið, havi eg onga sannføring fingið um.

Royndartíðin við svartkjaftinum má nú sum sagt vera at enda komin. Nú mugu ið hvussu er vit løgtingsmenn fáa at vita, hvørjir møguleikar liggja í framhaldandi privatum og ikki minst almennum íløgum í gagnnýtingini av hesum stóra fiskastovni, sum higartil bert hevur drigið út úr landskassanum bæði til skip og studningar. Ein svøltandi heimur við støðugt vaksandi proteintørvi hevur lítlan handilsligan týdning, um ikki so frægur prísur verður latin fyri vøruna, at tann framleiðandi vinnan er før fyri at bera seg bæði nú og í framtíðini. Her hjálpa eingir dreymar, men bert hin turri

veruleiki.

Eg haldi ikki, at tað er landsstýrisins uppgáva at selja fisk. Er ringt, sum er, hevði eftir mínum tykki einki verið betur av at tikið sølupartin av útflutningi okkara frá teimum, sum mugu haldast at hava skil fyri slíkum og lagt hann undir onkran nýútbúnan fulltrúa í landsstýrinum.

Á hin bógvin vil eg halda, at av tí at tað almenna, tað er einstakur føroyingur, sum tíð er liðin, er vorðin so stórur fíggjarligur partur av øllum vinnulívi okkara, má hitt almenna - løgting og landsstýri umboða borgarar sínar og krevja at hava innlit í, hvussu tær hundraðtals milliónir, sum ár um ár verða veittar frá tí almenna, verða umsitnar og nýttar.

Í hesum sambandi verður ein endurskoðan av ráfiskagrunsskipanini neyðug. Eitt stýri við Tjóðveldisflokkinum sum parti kann illa standa og hyggja at, at allir fáa sitt, áðenn fiskimaðurin sleppur fram at eftir molunum, tá ruggar ikki alt rætt á Føroya landi og tá má okkurt broytast.

Mær tykir, at greinin um íðnaðarmál í løgmansrøðuni beinleiðis heitir á føroyskar politikarar um at rudda upp í hesum frumskógi. Greitt verður frá trupulleikum hjá trimum illa trongdum stovnum sum Menningargrunni íðnaðarins, Føroya íðnaðargrunni og Menningarstovu landsins. At skjóta trupulleikarnar til vantandi marknaðarkanningar og kapping um arbeiðsmegina er helst ov bíligt. Fáur er so óvitandi her á landi, at hann kennir ikki trupulleikarnar. Hvat skulði verið nátúrligari enn at rent allar hesar stovnar saman í ein.

Meira sjálvsagdur mátti verið ein samskipaður íðnaðarpolitikkur úr einum grunni við einum endamáli, hvat navn, hann enn ber.

Alivinnan, sum byrjaði sum eitt bjart kapittul í vinnulívssøgu okkara og sum so stórar vónir vórðu settar til, er sum øllum kunnugt í stórum trupulleikum. Heilsufrøðilig politisk og búskaparlig stýring á hesum nýggja vinnulívsøki hevur trotið í so stóran mun, at henda vinna í dag meira er útreiðsla enn inntøka búskaparliga og útlitini eru alt annað enn bjørt. Eins og við svartkjaftinum má eisini henda royndartíð skjótt vera av, so vít fáa at víta, hvar vit flóta og hvussu framtíðarpolitikkur og framtíðaríløgur eiga at leggjast til rættis. Búskaparliga og heldur ikki marknaðarliga ber til í ein mansaldur

aftrat bara at lata standa til. Tað fer ikki at bera til í framtíðini at grýta alliloyvi út, fyrr enn vinnan hevur styrkt seg á tryggari grund, enn hon hevur nú.

Vónandi fæst alivinnan skjótt í eina trygga legu og kann gerast eitt gott íkast í búskap okkara, men hetta krevur bæði yvirlit og fyrilit og ikki minst ansni.

Tað kemst ikki uttanum, at tað hevur eydnast samgonguni at gera skattaskipanina einfaldari og rættvísari ikki mínst við tað, at kapitalvinningur nú verður skattaður.

Tá ið eg lesi, at tað landsstýri, sum byrjaði ta fyrstu upprúddingina í skattafrumskógi okkara, í løgmansrøðuni niðursetandi verður nevnt tað sokallaða sjálvstýrislandsstýrið, so undrar tað meg stórliga, at henda málbering er sloppin í gjøgnum í landsstýrinum. Hóast alt vóru tveir av verandi landsstýrisflokkunum við í tí landsstýrinum, sum neyvan man hava verið meira sokallað enn onnur landsstýri.

Sum øllum kunnugt, var tað serliga Tjóðveldisflokkurin í sjálvstýrislandsstýrinum, sum fekk Húsalánsgrunnin settan á stovn og at stimbra henda stovn, sum fyrst og fremst skal hjálpa teim ungu at seta búgv, men nú eisini hevur aðrar uppgávur, hevur síðan verið eitt av hjartamálum floksins, og tí eru øktar játtanir til henda stovn okkum sera vælkomnar.

Innan málsøkið skúli og undirvísing, sum Tjóðveldisflokkurin umsitur í landsstýrinum, merkir prinsipplóggávan frá í ár einki minni enn eina kollvelting. Fyri fyrstu ferð er ein lagntíðarheildarætlan gjørd, serliga fyri tær tilafturskomnu, tær misrøktu og tær nýggju og neyðugu útbúgvingarnar. Fíggjarliga verður tó neyvan gjørligt at fremja tær allar eftir stuttari tíð.

Eg skal enda við at nema við tvey mál, sum ið hvussu er partvis líkjast nakað: flogmálið og undirgrundarmálið. Tá eg sigi líkjast, so er tað út frá tí opinbera imperialistiska politikki, sum danir hava avdúkað í hesum málum. Bæði eru tey væl kend av øllum tingmonnum og Føroya fólki, so eingin grund man vera at fara at lýsa tey út í æsur.

Tað undrar meg, at lítið ella einki verður sagt í løgmansrøðuni um, hvar flogmálið flýtur í løtuni. Eg vóni bert ikki, at ætlanir eru um at gera nakran handil við Maersk Air eftir tann atburð, ið teir hava sýnt mótvegis roynd um okkara at stovan eitt føroyskt flogfelag

við øllum útliti fyri at klára seg.

Mest nátúrligt hevði verið, at málsøkið flogferðsla varð yvirtikið sum føroyskt sermál. Tað má vera fleiri kunnugt, at eg sjálvur seint í fjarnu tingsetu hevði gjørt liðugt uppskot um hetta, og at uppskotið var lagt upp á formanspallin at býta út. Men av tí at ein av samgonguflokkunum hótti við samgongusliti, um uppskotið varð lagt fram, valdi eg fyribils, og eg endurtaki fyribils, at taka uppskotið aftur og at leggja tað fyri samgonguna at hava við í umhugsanum sínum í flogmálinum. Tað er møguligt at neyðugt verður at leggja uppskotið fram í hesi tingsetu. Verður tað hildið at vera neyðugt, verður tað sjálvsagt gjørt.

Í undirgrundarmálinum er støða Føroya løgtings púra greið. Málsøkið ráevni í undirgrundini skal yvirtakast á føroyskar hendur. Her slakar Tjóðveldisflokkurin ikki ein tumma. Verður undirgrundin avreidd í móti samtykt Føroya løgtings, so má hetta gerast av einum meiriluta, sum Tjóðveldisflokkurin ikki verður partur av. Latið danir bróta sínar egnu lógir, vit mugu ikki bróta samtyktir Føroya løgtings.

Vit mugu gera okkum greitt, at um heilt stutta tíð, hevur Danmark ongan sjálvstøðugan uttanríkispolitikk og ongan sjálvstøðugan verjupolitikk, hernaðarpolitikk.

Danmark eigur tá heldur onga undirgrund. EEC eigur tá øll undirgrundarrættindi. Eisini rættin til undirgrund Føroya, um vit ikki sjálvir til ta tíð hava yvirtikið hana. Tí hevur hetta mál hin størsta skund, tí her er vandi á ferð.

Teir, ið nú fara til samráðingar við donsku stjórnina í seinastu royndini at yvirtaka undirgrundina, eru bert bundnir av samtykt Føroya løgtings og ongum øðrum. Kommissorium teirra er púra greitt.

Tað má tí eisini verða greitt, at spyrst heldur ikki hesaferð nakað úrslit burturúr, so má Føroya løgting taka málið í egnar hendur og sjálvt skipa fyri teirri lóggávu viðvíkjandi ráevnum í undirgrund og havbotni, sum gerst alt meira átrokandi og lívsneyðug. Hetta mugu danir síggja og skilja sum eina avleiðing av, at teir sjálvir hava brotið heimastýrislógina umframt millumtjóða sáttmálar um rætt tjóðanna til egið tilfeingi.

Verður hetta stórmál ikki loyst í tí anda, tað varð samtykt á Føroya løgingi, so fari eg stórliga at ivast í, um

løgmaður fær rætt í vón síni, tá ið hann móti endanum av røðu síni tekur til, at samgongan gongur óskammað fyri dóm veljarans í heyst.

Í øllum førum verður tað veljarin, sum skal taka støðu til, um samgongan hevur rætt til hesa vón.

Jógvan Sundstein (ff.)

Harra formaður.

Vit vita og vit hava erfarið í hesi 4 árini, hetta landsstýrið hevur sitið, at landsstýrið hevur kravt inn pening til landskassan fyri at betra um gjaldføri landskassans. Hetta er kravt inn í so stóran mun, at landskassin hevur havt yvirskot tey seinastu 2 árini upp á einar tvey-trý hundrað milliónir kr. um árið, men úrslitið hevur so verið tað, at í 1988 er figgjarlógin spent á tamb. Vit hava hækkað alt niveauið fyri almennum útreiðslum við hesum somu trý-fýra hundrað milliónum kr. um árið og í 1988 sær ikki út til, at nakað yvirskot verður á figgjarlóginí ella landskassans roknskapi. T.v.s. at hesin peningur, ið verður fluttur yvir í landskassan frá tí privata sektorinum og frá vinnusektorinum, hann hevur eirki annað havt við sær, enn at tær almennu útreiðslurnar eru øktar, at forbrúkið er økt bæði tað almenna og tað privata og samstundis hava vit fingið større hall á gjaldsjavnaðinum og fáa eina større uttanlandsskuld, tá ið hetta árið er liðið soleiðis, sum løgmaður eisini viðgongur í síni ólavssøkurøðu.

Løgmaður leggur nokk so stóran dent á, at Landsbankin skal virka sum eitt stýrisamboð í búskapi Føroya, og tað er rætt, at uppgáva landsbankans er at vera eitt ávist stýrisamboð og at vera bankasamband landskassans, men harvið skuldi eisini uppgáva landsbankans verið úti. Og eg vil gera vart við, at aftan á valið vil Fólkaflokkurin í møguligum samgongusamráðingum koma við uppskoti um broyting í landsbankalógini, soleiðis at ikki privatir og kommunur o.o. hava møguleika at seta pening inn í landsbankan, tí harvið missir hann alla sína meining sum ein landsbanki og sum ein forleypari fyri einum komandi tjóðbanka, men verður bara eitt millumting í millum teir privatu bankarnar og ein landsstýrisstýrdan banka.

Jørgen Thomsen, háttvirdi figgjarnendarformaður, var nokk so nógv inni í síni seinnu røðu á rentuskattaspurninginum og vildi verða við, at núverandi rentuskattalóggáva, rentu-

skattaskipan kostaði landskassanum, hann nevndi tal upp á 200 ella 300 mió.kr.

Hetta er fyri tað fyrsta ikki rætt. Fyri tað fyrsta kostar henda skattaskipan ikki landskassanum nakað sum helst, tí at landskassin hevur ikki nakrar inntøkur, sum hann letur í stuðningi til hetta her. Tað, sum tað í allar hægsta grad kann koma út uppá, tað er, at landskassin fær eina møguliga minni skattainntøku, og tað er í og fyri seg ikki nakað, sum kostar landskassanum, men tað, sum vit mugu skilja í hesum her, tað er, at tann føroyska uppsparingarskipanin, sum hevur fungerað nú í út við ella umleið 40 ár, at hon hevur ført við sær eina tradition fyri uppsparing hjá tí vanliga føroyinginum í teimum føroysku peningastovnunum. Nakað, sum hevur havt óalmindiliga stóran týdning fyri bæði familjuøkonomiin og fyri landsbúskapin her á landi.

Tá ið vit fara at hyggja at hesum problematikki, so er tað ikki rentuinntøkurnar, sum eru problemið hjá samfelagsbúskapinum. Tað er ikki tann lætta skattingin av rentuinntøkunum, sum er problemið. Tað er møguliga, um nakað problem er, og eg havi einki í móti, at man kannar málið og finnur út av, um nakað problem er, men er nakað problem, so eru tað rentuútreiðslurnar, sum møguliga eru problemið. Tað mugu vit gera okkum greitt. Vit hjálpa ikki landsins búskapi á nakran hátt við at herða skattingina av rentuinntøkum. Eins og vit ikki hjálpa landsins búskapi á nakran hátt í heila tyki við at meirskatta áður skattaðan vunnan pening.

Vit kenna í øðrum londum, har hava teir ognarskatt og ognarskattur ella tað, sum á donskum verður dópt "formueskat", tað er ikki annað enn skatting av áður tjentum og skattaðum inntøkum, t.v.s. tað er ein dupultskatting, sum fyrigongur og tað vil eg ávara ógvuliga sterkt ímóti, at man bara hugsar í handan rætningin.

Seinasti ræðari Hans Jacob Debes var inni á tveimum málum, sum eg ætlaði eisini at viðgerða.

Annað var flogferðslumálið. Vit hava jú nú fingið eitt nýtt føroyskt flogfelag. Eitt flogfelag, sum sær út til at ganga væl. Teir hava fingið gott flogfar, teir hava góða service umborð og tað sær út til, at rutan í sær sjálvum gongur ógvuliga væl. Vit vita eisini, at tað danska flogfelagið, sum skuldi líkasum verða jarðar-

móðir hjá hesum føroyska, verður noytt til at taka seg burtur úr samarbeiðnum, og tí verður óivað ein politiskur spurningur, hvussu hetta felag skal skipa seg í framtíðini, og har vil eg bara siga fyri okkara viðkomandi, at vit eru altið til reiðar at samráðast um møguliga loysn av hesum máli.

Undirgrundarmálið verður ikki nógv viðgjørt av løgmanni í løgmansrøðuni. Hann sigur, at tað er komið eitt álit frá eini nevnd, hetta álit skal vera loynt. Vit fáa ikki at vita, hvat stendur í tí nakað sum eftir okkara uppfatan ikki er serliga klókt fyri tað fyrsta, ikki serliga demokratiskt, tað er nakað, sum faktisk ikki hoyrir heima hjá eini stjórn í einum parlamentariskum landi at halda slík mál loynd, sum hava so stóran týdning fyri samfelag okkara. Men eg haldi meg kunna lesa í millum linjurnar, at løgmaður er við at uppgeva hetta mál, og tað harmar meg, at tað skal verða komið so langt hesi 4 árini, hetta landsstýrið hevur sitið, at hetta mál næstan er mist á gólvið og tí er tað av ógvuliga stórum týdningi, at hetta landsstýrið, tá ið tað fer til samráðingar, ikki bindir seg til nakra vánaliga loysn á hesum máli, men so heldur letur tað liggja til eina nýggja komandi samgongu og eitt komandi løgting at avgreiða, tí eg trúgvi, at gongur man eftir teimum loysnum, sum vit høvdu frammi beint áðrenn, tingið fór heim, eftir tí uppskoti, sum fekk - minnist meg rætt - 13 atkvøður her á tingi um broytta heimastýrislóg, so trúgvi eg, vit koma eitt stig nógv longur á hesari leið.

Hetta er sandsýnligvís seinasta útvarpaða umrøða úr hesum tingi áðrenn valið og eg skal tí persónliga nýta høvi til her at takka í øllum førum tveimum tingmonnum, sum hava boðað frá, at teir ikki stilla uppaftur. Teir hava sitið í nógv ár her á tingi. Tað eru Hilmar Kass og Poul Jacob Olsen, sum ikki taka lut aftur í komandi vali. Sjálvt um vit mangan hava verið ósamdir, so rokni eg ikki við, at tað eru nakrar "bad feelings" okkara millum persónliga, og eg vil takka teimum fyri tað politiska samarbeiðið, vit hava havt. Vit verða kanska fleiri aðrir, sum ikki koma inn aftur í tingið, men so verður tað av øðrum orsøkun, men teimum, sum fara frívilliga, vil eg takka fyri gott samarbeiði.

Formaðurin

Ja, tað er soleiðis, at vit steðga orðaskiftinum um løgmansrøðuna her og taka tað upp aftur kl. 10°° fyrrapartin í morgin, men áðrenn vit niðurleggja fundin, so fær Poul Michelsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 5: Krøv til framtíðarflogvøll í Føroyum.

Poul Michelsen (ff)

Harra formaður.

Tað er løgtingsmál nr. 5, uppskot til samtyktar, og viðmerkingarnar eru soleiðis:

Eftir at fingið er til vega tilfar, ið rímuliga væl lýsir tørvin á flogsambandi føroyinga bæði - nú og í framtíðini - og eftir, at sakkøn - bæði innanledis og útlendis - hava sagt sína áskoðan, stendur greitt, at føroyska samfelagið rættiliga skjótt má fáa ein flogvøll, ið svarar til tey ynskir og krøv, brúkarin setir av einum framtíðar flogsambandi við útheimin.

Skuldi tað óhugsandi hent, at hædd ikki verður tikin fyri hesum, ber føroyska samfelagið kostnaðin av sera umfatandi avleiðingum, bæði so og so.

Ikki er dámligt at nema við trygdarviðurskiftini í samband við flúgving, men hetta er og má verða ein sera týðandi partur av eini flogvallarloysn. Veruleikin er ikki altið líka tespiligur, men sjónsk tekin eru til, at líkaséla mótvegis alheims fyrisettum reglum eigur rúmar ræsir, bæði hjá føroyskum og donskum myndugleikum.

Flogvøllur Føroya skal tí lúka ICAO sett krøv og verða soleiðis útgjørdur og liggja soleiðis í lendi, at øll meðalstór vanlig flogfør við vanligari útbúnaðari manning kunnu lenda. Føroyska samfelagið verður tá samanbundið við alheims flogferðslunetið við tei fyrimunum, ið hetta náttúrligt hevur við sær og ikki sum í dag, har serútgerð og ser- og fráviksloyvir eru gundin undir allari Føroyaflúgving.

Figgjarligu avleiðingarnar eru eisini hareftir, og í dag ber til at útrokna hesar. Skelkandi tøl, tí fyri samfelagið snýr hetta seg um eitt stað millum 50 og 100 mió.kr. árliga, og fyri brúkaran merkir hetta, at hann má gjalda 6-700 kr. ov nógv fyri hvønn einvegis ferðaseðil.

Sum frálíður tá ferðafólkatalið er komið upp á 200 túsund og góðskuflutningurin byrjar av álvara gerast figgjarligu avleiðingarnar so ramar, at samfelagið ikki kann bera hesar.

Irregularitetur og flutningskostnaður til og frá flog

vøllinum liggja aftan fyri útrokningarnar. Ófrælsa kappingin, tíðarmissur og íløgukostnaður eru tá ikki tikin við, men sjálvsagt liggja eisini her tøl, ið tala fyri nýggjari floghavn í Føroyum.

Ein "CODU 4" og "CATEGORI I" flogvøllur, er tí minsta krav, ið setast kann. Serkønir meta, at minsta flogbreytalongdin, talan kann verða um, er 2200 metrar, men helst eigur møguleiki at verða fyri at leingja hesa, tó kann ein longd upp á 1800 metrar nøkta tørvin tey fyrstu árini.

Slíkur vøllur í "CATEGORI I" (instrumentflúgving) økir munandi um trygdina í sambandi við fráferð og komu til vøllin bæði á ein og annan hátt.

Tekniska stuðulsskipan saman við valdu flogvallarloysn, ger flogferðsluna meira álítandi og regluliga, har veður og vindur ikki hava ta stóru ávirkanina. Opnað verður fyri nýggjum brúksmøguleikum og góða búskaparliga árinið er sjónligt.

Harmiligt er at ásanna, at landsins myndugleikar ikki vilja siggja í eyguni tær avmarkingar, ið verandi flogvøllur hevur og altíð vil hava, men heldur eru sinnaðir at lata ótolandi avleiðingarnar ganga út yvir brúkaran og harvið samfelagið alt. Tí er neyðugt við hesi samtykt, og at boða donsku myndugleikunum frá hesari. Alt bendir á, at danskir myndugleikar í dag eru fegnir um at fáa henda møguleika og soleiðis sleppa burtur úr tí, teir eru við at koyra seg fastar í í Vágum.

Og samtyktin ljóðar soleiðis:

Uppskot til samtyktar.

Føroya løgting samtykkir fyri at tryggja framtíðarflogsamband framyvir við útheimin, at Flogvøllur Føroya skal lúka ICAO sett krøv í "coðu 4" og "categori I" bólkinum.

Best var, um vøllurin kann gerast 3.000 metrar langur, men hann má ikki vera stytri enn 2.200 metrar.

Takk fyri, harra formaður.

Formaðurin

So fær Poul Michelsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 4: Loysn av flogvallaspurninginum í Føroyum.

Poul Michelsen (ff.)

Ja, harra formaður.

Tað er løgtingsmál nr. 4 og tað er uppskot til løgtingslóg um loysn av flogvallaspurningínum fyri Føroyar og viðmerkingarnar síga soleiðis:

Donsku flogferðslumyndugleikarnir fáast í løtuni við at meta um, um nøkur framtíð er í flogvøllinum í Vágum. Roknast

má við, nú metast skal um
framtíðar flogferðslu í
Føroyum, at donsku
myndugleikarnir eisini fara at
taka aðrar flogvallarloysnir
við í metingum teirra, eitt nú
Glyvursnesætlanina.

Longu nú kann við rímuligari
vissu sigast, at ein leingjan
av vøllinum í Vágum er sera
kostnaðarmikil og at henda,
sjálvt um hon verður framd,
ikki bøtir um tær avmarkingar,
ið eru, kanska beint
tvørturímóti.

Tá undirsjóvartunnilin fram, var hesin ætlaður at verða eitt samferðslulið sum, í høvuðsheitum skuldi knýta Vágarnar tættari at meginlandinum. Nú er hetta broytt og undirsjóvartunnilin er nú í høvuðsheitinum tengdur at flogvallarmálinum, og má tí eisini verða við ið teimum metingum, sum verða gjørdar um útbygging av Vága floghavn. Landsins fíggjarorka er avgjørt avmarkað og nú sær út sum, at landsins mynduleikar ætla at tálma virkseminum, sjálvt um ein kann halda, at langt er frá ætlan til gerð her so er ivaleyst rætta at vit ongantíð ov skjótt taka hetta í ramasta álvara. Rættast má tí verða, at eingin útbygging verður sett í verk, sum hevur samband við Vága Floghavn, fyrr enn stungið er út í kortið og vissa er fingin fyri, at vit fáa sum mest burtur úr tí orku, vit hava. Tilfarið ið grundar undirsjóartunnilin bæði teknískt og fíggjarliga er spinkult men saman við útbyggingunum í Vágunum ið onkur vil fremja, so er hóast alt talan um íløgur fyri 500-600 mió.kr. Rætt er at prioritera flogvallarmálið fremri enn fasta sambandið millum oyggjarnar, men so eigur eisini trygd at fáast fyri, at tann orka, ið er tøk verður at nýta fyri hetta endamál, tí má eisini verða rætt at steðga við at seta nakað í verk, fyrr enn metingin kemur frá teimum serkønu her eisini íroknað frá donsku flogferðslumynduleikunum, men lógaruppskoti, er soleiðis harra formaður: Løgtingslóg um loysn av flogvallarspurninginum í Føroyum.

§ 1. Eingin størri útbygging av Vága Floghavn verður gjørd fyri, at henda inngongur í eina samlaða meting av framtíðarflogvølli í Føroyum.

§ 2. Udirsjóvartunnilin, ið er partur av hesi útbygging, eigur at verða umfatað av hesi lóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Takk fyri harra formaður

Formaðurin

Framløga av tingmáli nr. 8 til broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Poul Michelsen (ff.)

Hetta uppskotið er eitt uppskot, sum varð lagt fram í fjør og hevði tingmálið tá nr. 97 og hevur verið til viðgerar í skattanevndini og kom tíl tingið við einari samlaðari nevnd, sum innstillaði at taka undir við uppskotinum tó við nøkrum broytingum, men av eini ella aðari orsøk, so fall hetta málið burtur, og tí verður tað so lagt fram av nýggjum aftur.

Í viðmerkingunum ljóðar soleiðis:

Málið verður framlagt 17. mars 1988 eftir fyrstu viðgerð og hetta varð also 7. apríl 1988 beint í skattanevndina. Skattanevndin viðgjørdi málið og var tikið undur við uppskotinum við teirri broyting at býtið av skattinum sum eftir táverandi uppskotið var 40% sum komunuskattur og 60% sum landsskattur skulu broytast til ávikavist 38% til kommunurnar og 62% til landskassan. Av eini hvørjari orsøk var málið ikki avgreitt aftur til løgtingið og fall so statt burtur.

Tískil verður uppskoti sett fram aftur við teirri broyting í % lutfallinum millum kommunur og landskassa sum tilskilað er omanfyri. Víst verður annars til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 97 frá 87 um broytingar í løgtinglóg um ásetan av skatti til landskassan. Uppskotið ljóðar soleiðis harra formaður:

Løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um ásetan av skatti til landskassan.

§ 1 í løgtingslóg nr.87 frá 1. september 1983 um ásetan av skatti til landskassan við seinni broytingum verður grein 5 orðað soleiðis: Vísandi til grein 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið nevnd. eru í grein 1 nr. 8 til 15 í somu lóg og teirra í grein 2 nevndu feløgum við meira, sum undir avmarkaðari skattskyldu ásetur 29% av inntøkunum til landskassan og kommunur. Skatturin verður býttur við 38% sum kommunuskattur og 62% sum landsskattur. og so kemur grein 2.Henda lóg fær gildi fyri skattir, sum verða líknaðir á inntøkur í tí roknskaparárinum, ið endar í álmanakkaárinum 1988 ella seinni.

Formaðurin

So er ikki meira til henda fundin. Fundurin verður niðurlagdur og hann verður tikin uppaftur í morgin kl.10°°.

Fundurin 18. august 1988 kl.10. fundurin verður uppafturtikin

Karolina Petersen (fr.)

Harra formaður.

Til umrøðu er løgmansrøðan. Løgmansrøðan er ein gjøgnumgongd av, hvat landsstýrið hevur fingið burtur úr farna valskeiði.

Til á páskum, sæt Framsóknarflokkurin í andstøðu og hevði til tá onga politiska ávirkan í landsstýrinum.

Síðani á páskum hevur flokkurin verið í samgongu

og hevur nú havt høvi til at ávirka førda politikkin í landinum.

Orsøkin til, at Framsóknarflokkurin játtaði at verða við í hesari samgongu var tann, at vit hildu tað verða óforsvarligt at hava val tá. Har afturat fingu vit møguleikan at gjøgnumføra nøkur av teimum málum, sum stóðu ovarliga á stevnuskrá okkara. Týdningarmikil mál, sum vit vildu hava framd, serliga á fiskivinnuøkinum og á sosiala økinum. Flokkurin hevur havt ávirkan á fiskaprísin og nú eru 3 av sosialmálinum klár at verða løgd fyri tingið, hesi eru uppskot um vardar íbúðir til pensionistar, uppskot um at bøta um viðurskiftini hjá pensionistum, sum arbeiða og fortjena eitt sindur akkurat pensiónini og uppskot um føroyska kærunevnd.

Fyri at taka lønarmálið hjá pensionistum fyrst, so veit hvør eldri maður og kona og hvørt avlamisfólk at tey fáa arbeitt so lítið fyrr enn, tikið verður av pensiónini. Tikið verður fyrst av tí, sum verður kallað viðbót og seinni av tí, sum eitur grundarupphædd. Tað er í dag ikki møguligt at loysa tað máli, við at broyta útrokningarnar av pensiónini, tí danir gjalda helvtina av henni. Í staðin er ætlanin at tey, sum missa av galdandi pensión skulu fáa eina føroyska serviðbót ístaðin fyri ta upphædd, tey hava mist.

Serviðbótin skal so gera at pensionisturin óræddur kann fortjena upp til nakað vist uttan at missa av tí, hann fær frá tí almenna. Vit eru vís í at hetta fer at koma væl við hjá øllum pensionistum, sum royna at fortjena nakrar krónur afturat pensiónini.

Annað uppskotið er um vardar íbúðir. Avlamisfólk, sum skulu liva av eini pensión, fara ongantíð at hava ráð til at byggja sær hús, tí ein pensión strekkjur ikki nakran veg til rentur og avdrátt. Uppskotið miðar ímóti, at sjálveigandi stovnar, sum verða stovnaðir við tí eina endamáli at fáa vardar íbúðir til pensionistar, avlamisfólk og eldri fólk, kunnu fáa 40% í studningi til slíkar bygging.
Hetta fer at bøta munandi um møguleikan hjá veikum bólkum at fáa góðar íbúðir at búgva í, sum tey hava ráð til at leiga.
Triðja uppskotið er um at seta eina føroyska kærunevnd í sosialum málum í staðin fyri "Den sosiale ankestyrelse", sum fall burtur sum kærustovnur fyri endurbúgving og hjálpartól frá 1. januar í ár.

1. januar verður møðrahjálparstovnurin settur á stovn, og

lækni settur til at taka sær av heilsurøkt hjá teimum gomlu í okkara landi.

Tey tiltøk, sum eru framd fyrr í ár eru hesi, røktarheim í Havn, Lágargarður, liðugt og tikið í nýtslu, blindastovnur í Havn liðugur og klárur at lata upp, nýtt heim bygt í Runavík til evnaveik, umlættingarheim í Klaksvík fyri evnaveik so gott sum liðugt og vardur verkstaður í Klaksvík liðugur og tikin í brúk, vardur verkstaður í Vági skjótt klárur at taka í brúk, leiðari er settur og bygging av heimum í Sandoy farin í gongd. Tey, sum nú standa fyrst fyri at fáa loyvi til at byggja eru heimini í Norðurstreymoy og síðani í Suðuroy. Skal eg gera ein vurdering av sosiala økinum so er langt eftir, til vit kunnu siga, at øll í veikari støðu, avlarin og gomul kunnu sigast at hava góð kor her á landi. Tað verður ikki gott, fyrr enn øll gomul fólk kunna vera verandi í síni egnu bygd, og ikki verða flutt í arða bygd fyri tað, um tey treingja til eina ávísa røkt.

Við møguleikanum fyri at byggja vardar íbúðir á bygd til eldri kunnu tey fáa ein møguleika afturat til at verða í bygdini, um íbúðirnar verða lagdar uppat einum dagcentri ella røktarheimi.

Sum hjálpartiltak fyri gomul, sum eru einsamøll í húsi hevur landsstýri latið Vistarheiminum í Runavík ein nýggjan kallisentral í staðin fyri gamla systemið, sum heimið hevur havt í nøkur ár. Við tí nýggja sentralinum kunnu nógv fleiri enn nú fáa kallitól, so tey altíð kunnu fáa boð frá sær, um tey eru einsamøll inni. Sum sagt á sosiala økinum er nógv eftir at gera, men vit vilja í landsstýrinum royna at bøta um fyri at gera okkara part fyri, at fáa korini betri.

Á kommunala økinum hevur nógv skriving verið um tað, at landsstýrið ikki hevur viljað góðkent allar lántøkur, sum kommunur hava ynkst sær. Beinleiðis orsøkin til landsstýrisins støðutakan var, at stóra virkseríð uppi á landi hevur havt við sær, at skipini fingu ikki manning og fiskavirkini ikki fólk, tey vóru neydd at senda boð í útlandi eftir fólki. Einum parti av t. stóra virkseminum stóðu kommunurnar fyri, men tað er nú einaferð fiskivinnan, vit øll skulu liva av her á landi, so tað kann aldrin ganga, at hon skal verða løgd upp á ís og bíða eftir at fáa fólk, meðan alt annað arbeiði óansað skal ganga frammum, tí var roynt at tálma tí virkseni hjá kommununum, sum var fíggjað við lánum, onnur

orsøk var tann, at samlaða lánibyrðan hjá føroyskum kommunum var meir enn dupult so stór, sum árliga skattainntøkan hjá kommununum og tað er eitt mark, sum kommunur skulu ansa eftir helst ikki at fara uppum, tí so fer ov stórur partur av inntøkunum hjá kommununum til rentur og avdrátt. Triða orsøkin var, at tað eru farandi kommunustýri, sum vilja taka lán og tað kanska ikki verða somu menninir, sum koma undir at hava ábyrgdina fyri, at lánini verða ufturgoldin. Vit hava bara tvær inntøkukeldur í Føroyum, tær eru danski stuðulin uppá 650 mió.kr. og so fiskivinnan, sum hevur eitt útflutningsvirið upp á 1900 túsund mió.kr.

Hevur fiskivinnan ikki góð kor, ella gongur fiskivinnan ikki væl, so kann tað verða skjótt, at minni verður at skatta av, og hevur kommuna tá stórar lánibyrðar, kann tað gerast torført at gjalda lánin aftur. Tað eru tey, sum hava funnist at hesum politikki, at landsstýrið hevur hildið aftur við lántøkum, men tað er hin sami gamli spurningurin um ikki at saga greinina av, sum tú situr á.

Takk fyri.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Harra formaður.

Løgmaður vísir í røðu síni á, at landsstýrið hevur til viðgerðar eitt tilmæli frá ríkisstjórnini frá loftferðslumyndugleikum um, at gera íløgur í flogvøllin í Vágum upp á einar 60 mió.kr. tey komandi 5 árini, og sigur hann, landsstýrið hevur tað til viðgerðar í løtuni. Eg fari at heita á landsstýrið um at fáa hetta her avgreitt hetta tilmælið, tí at tað má hava ligið har í landsstýrinum nakað leingi eftir sum, fíggjarárið 1988, sum nú ferð at enda um nakrar mánaðar, er við í tí yvirlitinum. Eg fari at heita á landsstýrið um at fáa avgreitt tað soleiðis, at ríkismyndugleikarnir kunnu fáa høvi til at gera tær íløgurnar, sum teir nú hava ætlað at gera. løgmaður sigur eisini, at ætlanin er at byrja upp á fasta sambandið nú her til heystar, og tað er hugaligt at siggja nú, tá ið vit koyra til Havnar at har veruliga er farið at síggjast eftir. Har eru komnar at standa avmerkingar o.s.v í vegnum, har sum tunnilsmunnin skal verða soleiðis, at tað fer at røkjast fyri, at hetta her arbeiðið, sum vit so spent hava gingið inn fyri har vesturí, nú fer at koma í gongd og tað eru vit takksom fyri. Annars er tað jú soleiðis, at borgarstjórin í Tórshavn, sum eisini er løg-

tingsmaður, í gjár legði uppskot fyri løgtingið um at steðga undirsjóvartunnilinum um Vestmannasund, sum eitt samt løgting. Poul Michelsen var sjálvur í summarfrí tá, samtykti beint áðrenn summarfríðtíðina, Poul Michelsen veit væl at uppskotini falla, men har liggja nokk onnur motivir aftanfyri, motivir, sum eg haldi, ikki eru verd at koma inn á í hesum her umfarinum. Men Poul Michelsen hevur nokk ongantíð verið tann góði taparin, og soleiðis verður hann nokk heldur ikki her. Hann veit væl, at frammferð hansara kemur at ella kann koma, íð hvussu so er, at skaða tað valstríðið, sum Fólkaflokkurin annars skuldi fara undur. Nú verða tað meira flogvallarviðurskifti og so víðari sum koma at verða viðgjørd kanska við einum ísletti av Namibia spurningunum, tí tað er jú tað, sum samgonguflokkarnir heldur vilja tosa um enn at tosa um teir politisku trupulleikarnar, teir fíggjarligu trupulleikarnar, sum hetta samfelagið hevur at dragast við eftir, at samgonguflokkarnir hava sitið og stýrt nú í 4 ár og eru við at koyra okkum á húsagang. Men tá hesi her uppskotini hjá honum koma til viðgerðar ein av fyrstu døgunum, skulu tá fáa tað viðgerð, sum tey hava uppibori∂, frá Fólkaflokkinum koma tey so ikki at fáa undirtøku.

Eg síggi, at Lasse Klein, landsstýrismaður er her í tingsalinum, og hann er jú vitandi um, at vit báðir tingmennirnir úr Vágum hvørja tað einastu tingsetu hava reist Gásadalsbergholið hetta her valskeiðið, og vit hava fingið svar frá honum ferð eftir ferð, at tað skuldi byrjast upp á Gásadalbergholið á vári í 198 men har er jú einki at síggja enn. Eg fari at spyrja Lassa Klein: Nær er ætlanin at fara undir bergholið til Gásadals?

Tað, sum hevur eyðkent røðuna hjá samgonguflokkunum bæði hjá landsstýris/ og løgtingslimunum undir hesi viðgerðini, tað er umrøður teirra av landskassans gjaldføri. Ferð eftir ferð hevur verði víst á, at landskassin í fíggjarárinum 1986 og 1987 hevði avlop upp á ávikavist 257 mió.kr. og 290 mió.kr. og so verður vanliga endað við hesum orðunum hjá løgmanni, at landskassin so dánt fer at klára skyldur sínar í fíggjarárinum, sum vit nú eru í, also í 1988. Vit hava frá Fólkaflokkinum hinvegin roynt at víst á, at hetta eftir okkara tykki als ikki er rós vert. Eitt avlop 2 fylgjandi ár í landskassroknskapinum upp á út við 600 mió.kr., tað er bert

fyri okkum eitt tekin um, at 600 mió.kr. eru tiknar ov nógv inn í skatti og tolli, haraftur at koma tær 500 mió.kr., sum gingu inn tá ið samband við, at samtíðarskattaskipanin varð sett í gildi, tær eftirstøðurnar, sum tá vóru. Eftir okkara tykki var tað betur, um hesin peningur, hesar her út í móti 600 mió.kr. vóru verandi ogn hjá einstaklingum og vinnufyritøkum, so hesar høvdu pening at standa í móti við í komandi tíðum. Tá ið inntøkulógirnar vóru til viðgerðar, tá mæltu vit til og settu uppskot fram um, at heldur skuldi setast í gildi lóg um premieraða uppsparing soleiðis at vit á tann hátt fingu táttmað privatu nýtsluni, og ikki fingu tað bølgnan í ti almennu nýtsluni og teimum almennu íløgunum, sum vit nú hava sæð hesi her árini.

Hin andstøðuflokkurin, Sambandsflokkurin, hevði uppskot um tvungna uppsparingarskipan í staðin fyri sum alternativ til inntøkulógirnar nakað, sum vit í øðrum umfari avgjørt, eisini mettu var betri enn inntøkulógar uppskotini hjá sitandi samgonguni, og vit søgdu, at vit vóru til reiðar at samráðast um tað.

Men bæði teirra uppskot og okkara uppskot fall, og hesar her inntøkulógirnar hjá samgonguni vórðu samtyktar í staðin fyri og so siggja vit í løgmansrøðuni eitt lítið brot, tað er soljóðandi við formansins loyvi.

Vørur til vanliga nýtslu, sum undanfarin ár eru vaksnar lítið, sum eisini ætlanin var við nýtsluavmarkandi tiltøkunum í 1986, tær vaksa nú aftur við 9%. Tað tykist sum stóri lønarvøksturin í 1987 og 1988 økir rættiliga um nýtsluna aftur. Tey nýtsluavmarkandi tiltøkini, sum løgmaður sipar til, tað eru tær so nógv umrøddu inntøkulógirnar, sum samgongan samtykti á løgtingi fyri skjótt trimum árum síðani. Sum kunnug fevndu inntøkulógirnar um ymisk tiltøk sum tilsamans skulu flyta einar 300 mió.kr. árliga frá føroyska vinnulívinum, frá føroyska húsarhaldinum inn í landskassan, her var talan um olju-og benzingjald, eykainnflutningsgjald inntøka av at rokna toll, av frakt og pakkingarútreiðslum o.s.fr. soleiðis, at allar vørur hækkaðu munandi í prisi, og eyka bil tollgjald av ferðaseðlum o.s.fr. Her var talan um at krevja einar 15.000 kr. og einar 15.000 væl at merkja longu skattaðar krónur frá føroyska miðalhúsarhaldinum. Sum undanførslu nýtti samgongan pástandin um, at tiltøkini komu at verða nýtsluavmarkandi, tey komu at minka um stóra arbeiðsvirksemið, tey komu at

hjálpa upp á stóra gjaldjavnahallið.

Vit í Fólkaflokkinum mæltu harðliga frá, sum eg nevndi, høvdu okkara uppskot ístaðin fyri. Vit vístu á, at hesi her uppskotini hjá samgonguni, vóru ósosial tí, tey raktu tey lægstløntu og barnaríkastu familjurnar harðast. At tey fóru at skapa sterk krøv um hægri lønir, og tey koma at skapa ófrið á arbeiðsmarknaðinum, at tey koma at verða til ampa fyri kappingarføri hjá føroyska vinnílívinum, at tey soleiðis koma at ávirka ráðfiskaprísirnar soleiðis, at hesir lækkaðu. At tey komu at vaksa ómetaliga nógv meira um almennu nýtsluna og almennu íløgurnar enn, tey komu við at fyribils avmarkað tað privatu nýtsluna. Og at tey soleiðis als ikki komu at hjálpa upp á føroyska gjaldjavnahallið. Tí verri men sjálvsagt fingu vit rætt. Allan vegin ígjøgnum fingu vit rætt, lønirnar eru hækkaðar og fiskaprísirnir eru falnir soleiðis, at fleiri av okkara frægastu fiskimonnum hava givið upp at lívbjarga sær á sjónum. Kappingarførið og rentabiliteturin hjá vinnulívinum er versnað, so stórt sæð øll fiskivinnan er um at fara á húsagang, og almenna nýtslan er nú bólgna har til, at tað, sum var avlop á fíggjarlógini, fera í hesum her fíggjarárinum at líkjast einum halli. Stórar peningnøgdir verða í dag fluttar frá roknskapinum frá seinasta ári til inniverandi fíggjarlóg, fyri at eitt nú ráfiskagrunnurin kann fáa tann neyðuga peningin. So, harra formaður, alt samanumtikið mugu vit siga at betri hevði verði fyri føroyska samfelagið, um tann politikkurin, sum rátt var til at reka í hesum her undanfarna 4 ára skeiðnum, var settur í hásætið og tað er bara eftir nú at vóna, at veljarin er samdur við okkum til eitt komandi val og fer at geva Fólkaflokkinum sítt álit soleiðis, at tann politikkurin kann verða settur í hásæti frammeftir.

Takk fyri.

Løgmaður (viðmerking)

Harra formaður tað er onki nýtt í tí at borgarligir politikarar argumentera við, at períngurin liggur frægast í lummunum hjá borgarunum, men hatta har, sum sagt var um tann búskaparliga virkningin av tollílógunum, tað er sjálvsagt heilt burturvið, at man kann venda tingunum so á høvdið, at peningurin, sum verður innkravdur til neyðug endamál hjá tí almenna, virkar øvugt soleiðis, at hann virkar forbrúksfremjandi. Lat okkum nú siga at tað eru 600 mió.kr. s[illegible] eru kravdar inn og sum Svend Aage Eilefsen metir eru kravdar

ov nógv inn, men samstundis vita vit, at 600 mió.kr. eru útlagdar fyri fallin veðhald,. Hesin peningurin er farin út av samfelagnum m.a. fyri disposition hjá feløgum, sum politikarar sum Svend Aage Ellefsen hava havt nógv við at gera.

Hesin peningur er so ikki farin í beinleiðis nýtslu tvørtur í móti, hann var góður at hava, hann fór so út av landinum og setti okkum betri fyri. Hevði tað nú verið so, at vit ikki skuldu havt nýtt henda peníngin til slík veðhald, so kundi hann kanska verið ekstra ordinert niðurgoldin upp á uttanlandsskuld, og tað hevði sjálvsagt verið betri, men at vit skuldu havt latið verið við at tikið henda peningin inn, tað hevði verið nærsagt ein katastrofa fyri Føroyar. Og so kann man mála tingini so skeivt upp við at fortelja, at tað vóru 500 mió.kr. í eftirstøðum, tað er møsn.

Tað vóru ongar 500 mió.kr. í eftirstøðum, tað var eitt munandi minni tal, og at hesin peningur er komin inn, hvar stendur tað, hvar er tað prógvað. Tað kann Svend Aage Ellefsen als ikki siga nakað um, tað er komið nakað av gomlum eftirstøðum inn, tað vita vit. Vit vita eisini, at ein hóp hevur tað verið neyðugt at avskrivað, og vit vita eisini, at talið ikki var 500 mió.kr. men munandi lægri. Og tá ið man so grætur um, at peningurin er tikin frá vinnufeløgum, tori eg at pástanda, at vinnufeløgini eru valla tey sum vildu goldið hesar 600 mió.kr. ella hava goldið tær.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Ja, harra formaður, viðvíkjandi skattaeftirstøðunum so var tað jú soleiðis, at vit tá ið samtíðarskattaskipanin varð sett í verk, fingu at vita, hvat ið eftirstøðurnar vóru og tað yvirlitið visti, at eftirstøðurnar vóru út móti 600 mió.kr. og tað, sum vit fáa at vita í dag tað er, at tað eru at kalla ongar skattaeftirstøður, so har er bara sum løgmaður, og so má løgmaður siga, hvat ið hann vil, men um hann hyggur, so vil hann ið hvussu so er siggja, at tað eru úti í móti 500 mió.kr. komnar inn í skattaeftirstøðum í hesum her valskeiðnum.

Viðvíkjandi hesum at flyta pengar frá ti privata yvir til tað almenna, so kann løgmaður bara hyggja á síðu 24 í skjalatilfarinum, sum vit hava fingið útfliggjað, so sær hann eitt týðuligt tekin um, at eg havi rætt nevniliga hetta, at tær almennu íløgurnar tilsamans í 1985, sum var tað fyrsta árið, handa samgongan sat, vóru upp á 518 mió.kr., men hækka

so til 644 mió.kr. í 1987 og so kemur virkningurin av inntøkulógunum í 1988 við 1 mia.kr. og 58 mió.kr. í almennum íløgum og væntandi í 1989 av hesum landsstýrinum planlagdar íløgur uppá 1 mia.kr., so hetta her er bara soleiðis, sum vit frá Fólkafloksins síðu vístu á, at henda samgongan ið hvussu so er og eg trúgvi heldur ikki, at aðrir politikarar høvdu havt nóg sterkan rygg til at átt hesar pengarnar liggjandi í landskassanum.

Henda samgongan er komin við uppskotum um útbyggingar av øllum møguligum sløgum tí fyrst og fremst, at teir áttu hesar pengarnar, sum teir hava tikið inn frá tí føroyska húsarhaldinum, tikið inn frá tí føroyska vinnulívinum .

Heini O. Heinesen (tv)
viðmerking

Harra formaður.

Tað hevur verið tosað nógv um tær eftirstøður, sum eru innkomnar vegna tað nýggju skattaskipanina.

Nú veit eg ikki, hvussu fólkafloksmenn høvdu roknað við, men teir høvdu roknað við at teir skuldu eftirgivið hesar 500 mió.kr. Nú er tað soleiðis, at man hevur umsitið kommunur, og har roknar man við efturstøðunum. Tær verða førdar við á roknskapinum sum eitt aktivt og man fer so og lánir hesar pengarnar ístaðin, um man skal brúka teir, áðrenn teir koma inn. Tað er tað vanliga, so hetta er tað reina tvætl hetta her um eftirstøðurnar. So er eitt aftrat eisini, so kemur Svend Aage Ellefsen upp her og sigur, at vit hava tikið ov nógv inn frá fólki. Hann stendur her og tosar um eitt berghol vestur til Gásadals, so skulu teir bora undirsjóvartunlar og nógvar aðrar útreiðslur og so øll uppskotini, sum arstøðan hevur lagt á ting.

Hvussu nógv hevði hetta ikki kostað aftrat øllum hinum, sum samgongan hevur framt? Eg vildi sæð, hvussu teir skuldu betalt hetta her. Men eitt er heilt givið, at eftirstøður hevur altíð verið rokna við í øllum roknskapum hjá øllum kommunum og eisini hjá landinum. Tað hevur ikki verið vanligt at lána penga úr bankunum at gjalda skatt við, men tað hevur verið gjørt, síðani kelduskattaskipanin varðv sett í gildi.

Løgmaður (viðmerking)

Harra formaður.

Tað knipur eitt sindur við samsvarinum millum tað, sum Svend Aage Ellefsen sigur

ta einu løtuna, og so tað, sum hann skal brúka tað, sum sagt verður til. Einki landsstýri vildi havt rygg til at havt hesar pengar liggjandi í landsstýrinum, sigur hann. Men tað er kortini so, at einar 300 mió.kr. lat okkum siga, at tað eru 600 mió.kr. tað snýr seg um, tað eru helst meira, einar gott og væl 300 mió.kr. hava so ligið í landskassanum, staðið á bók í Danmark hesi her árini, og samstundis eru 600 mió.kr. útgoldnar fyri fallin veðhald, hesa tíðina. So eg veit ikki, hvar pengarnir skuldu komið frá, sum skuldu verið nýttir til at framt eitt annað fólkafloksuppskot, sum gekk út upp á í samband við farmavinnuna at rinda fyri tað fyrsta, tað sum útlendingar nú hjálptu okkum við at rinda, tey tap, sum útlendingar høvdu, eini 150 mió.kr. plus 100 mió.kr. fyri, at upparbeitt eitt undirskot upp á 20 mió.kr. árliga av rakstrinum av hesum farmaskipunum. Vit skuldu betalt 100 mió.kr. fyri at upparbeitt eitt undirskot upp á 20 mió.kr., tað stendur jú svart upp á hvítt í upplýsingunum frá Hagdeildini frá í fjør. So tað hongur ikki saman hatta har við, at man skuldi havt latið verið við at innkravt hesar pengarnar. Nei, tað var eitt Guðs held, at vit høvdu rygg til at krevja hesar pengarnar.

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var ein viðmerking fyrst til Heina O. Heinesen, tá hann tosar um skattaeftirstøður. Nú er tað soleiðis, at vit tosa um gjaldføri hjá landskassanum, og gjaldføri, tað er, tá man hevur pengarnar í kassanum, og hann avmyndaði tað so ógvuliga týðuliga sjálvur, hann sigur, at um at vit altíð hava eftirstøður í kommunuroknskapinum, og tá íð vit hava hesa efirstøðuna, so fara vit út at lána pengar til hetta her og brúka teir. Men tá íð eftir støðurnar eru inngoldnar, tá hevur kommunan betri gjaldføri og tí er ikki neyðugt at fara út at lána, og tað er júst tað, sum hevur gjørt seg galdandi í landskassaroknskapinum. Tað er júst hatta, sum er galdandi í landskassaroknskapinum skattaskipanin. Tann nýggja samtíðarskattaskipanin, sum hvørki Javnaðarflokkurin ella Tjóðveldisflokkurin var við til at fremja á tingi hevur gjørt sítt til at skattaeftirstøðurnar í Føroyum so at siga eru burtur, og tað skulu vit allir samlir verða sera glaðir og takksamir fyri

Um nakað er avskrivað og nakað er feilir og nakað er rættað tað eru ting, sum vit vanligir tingmenn ikki hava atgongd til at kanna, og tí kunnu vit ikki úttala okkum. Men eg haldi, at Atli Dam fer eitt sindur lætt um hetta skjalið á síðu 24 í fylgiskjølunum, tá hann vísir um almennar íløgur og privatar íløgur.

Í 1984 vóru tær almennu íløgurnar ca. 1/3 av teimum privatu íløgunum, og eftir prognosunum fyri 1989 eru tær fulkomiliga javnar, so her er ein fantastisk snaring frá privatum íløgum yvir til almennar íløgur, og tað stendur rimmar fast við skjølunum hjá landsstýrinum.

Sverd Aage Ellefsen (ff.) viðmerking.

Ja, harra formaður.

Nú svaraði Anfinn Kallsberg Heina O. Heinesen aftur, at Heini O. Heinesen vildi verða við, at vit frá Fólkafloksins síðu høvdu hugsað okkum, at eftirgivið tær skattaeftirstøðurnar, sum sjávsagt vóru ikki, men tær skattaeftirstøðurnar, tær stóðu sum eitt aktiv, og vit høvdu roknað við teimum 500 mió.kr., sum gingu inn í landskassan í hesum her skeiðnum, um vit sótu úti í Tinganesi og tað gjørdu vit eisini í samband við tað uppskotið ið vit høvdu í so máta.

Viðvíkjandi undirsjóvartunnlinum vestur í Vágar, sum hann kemur inn uppá, tá vit nú hava gingið inn fyri honum, so kunnu vit. Hvussu hongur tað saman við, at vit ikki vildu krevja hesar her pengarnar, hesar her 300 mió.kr. árliga inn frá skattgjaldaranum, men har er tað soleiðis, at vit frá Fólkaflokkinum alla tíðina hava tikið undur við hesum her bunngjaldinum, sum varð ásett soleiðis, at tann samfelagsíløgan, tann skilagóða og neyðuga samfelagsíløgan kemur at gjalda seg sjálva aftur.

Viðvíkjandi hesum her, sum Atli Dam førir fram, so er tað nú bara soleiðis at tær almennu íløgurnar eru hækkaðar samsvarandi tí, sum teir hava lagt av byrðum á tað privata, meðan tær privatu íløgurnar eru minkaðar samsvarandi somu byrðum, sum tær almennu eru øktar soleiðis at tær hava flutt virksemið frá tí privata yvir á tað almenna, ið hvussu so er hava teir økt munandi um tað almenna. Gott nokk hava teir ikki enn skert tað privata so nógv, men tann dagurin fer jú at koma, tí vit vita øll, at kreditvirðið hjá føroyingum er munandi fallið undir hesum landsstýrinum.

Viðvíkjandi teimum effektivu veðhaldunum, so skulu vit minnast til, at upphæddirnar til at bera ta útreiðsluna,

vórðu settar á fíggjarlógina, meðan fíggarlógirnar góvu hesi her nógv umtalaðu avlopini, so tað vóru pengar, sum vóru innroknaðir frammanundan avlopunum ið vóru.

Heini O. Heinesen (tv.) viðmerking

Ná, men tað skal verða heilt stutt.

Anfinn Kalsberg kemur upp her og prógvar tað, sum eg havi sagt. Hann sigur, at man kann lána upp á eftirstøðurnar. Tað er eitt aktivt, sum man kann lána uppá, men tá eftirstøðurnar eru burtur, harra Anfinn Kallsberg, hvussu kann man tá fara at lána upp á tær eftirstøðurnar? Tá eru tær brúktar.

Løgmaður eina viðmerking

Harra formaður.

Tað eru hesi her skjølini viðvikjandi íløgum, sum verða tulkað ella eitt sindur mistulkað av andstøðupolitikarum. Teir pástanda, at tað er tikið frá tí privata og flutt yvir á tað almenna, tað er ikki so. Tær privatu íløgurnar liggja í eini støðugari legu umleið 1500-1600 mió.kr., tær almennu eru vaksnar, tær vóru 700 mió.kr. í fjør, og ein meting sigur 1000 mió.kr. Nú ivist eg í, at metingin kemur at halda, tí tað vísur seg altíð, at eitt lítið sindur niðanfyri metingina liggur tað endaliga úrslitið vanliga. Men o.k. tað verður ein munandi vøkstur í almennum íløgum. Eg hugsi, at tað fyrí meginpartin eru íløgur, sum vit hava verið samdir um, sum Fólkaflokkurin hevur atkvætt fyri, sum Fólkaflokkurin hevur krav, so her uppi í eru jú, bæði útbygging av flogvøllí, undirsjóvartunnli og øðrum tunnlum, so tað er ikki so løgið, at tær almennu íløgurnar vaksa, men tær vaksa ikki upp á bekostning av teimum privatu, heldur tvørturímóti, at meginparturin av teimum eru framdar ella verða framdar, til tað skal gerast lagaligari hjá teimum privatu at fremja íløgur og at fremja vinnuvirksemi. Men konklusiónin í mínari tali á Ólavsøku er júst tann, at hesar íløgur til ca. 1 mia. árliga plus íløgurnar frá privatari síðu til hálva aðru mia., tær mugu og skulu strekkjast nakað longri, so tit sleppa ikki at leika soleiðis í, sum tit hava gjørt higartil og tað óansað tí føroyska kreditvirðinum. Tað er nú ikki rætt, at tað er minkað, ein av høvuðstrupulleikunum hevur verið, at tálma hesum her peningastreyminum til Føroyar, sum er í komin júst tí, kreditvirðið er so stórt og so

so gott framvegis.

Karin Kjølbro (tv.)

Harra formaður.

Løgmansrøðan er áhugaverdur lestur eins og fylgiskjølini. Lagt skal verða aftrat, at málsligi búnin er vikin frá tí vanliga til tað betra. Eg hugsi, at tað hevði verði rættiliga forvitnisligt hjá málkønum at granska løgmansrøðurnar seinastu 20 árini, her er ein góðsking farin fram, ið vit øll kunnu fegnast um. Skal innihaldi og leiðin annars góðskumetast, so kann hetta t.d. setast í samband við tær ætlanir, ið vit løgdu fyri 4 árum síðani.

Vit eru nú í 12. tima í hesum valskeiði, og stórvegis broytingar eru ikki væntandi higar til valið.

Fyri Tjóðveldisflokkin er tó eitt hjartamál alsamt eftir, tað vóna vit at røkka og tað er undurgrundin. Við tí nýggja tilfari, ið samráðingarnevndin hevur fingið, er at vóna, at vit røkka mál. Tey, ið standa aftan fyri hesa samgongu, eru eyðvitað fegin um mangt og hørm um minni.

Eg fari at taka fram nøkur mál, eitt nú búskaparligu støðuna, ið vit í Tjóðveldisflokkinum løgdu áherðslu á at fáa at nema við almanna-og heilsumál, tí eg eri stjórnarlimur í vent, og harumframt er ætlanin hesi nevnd í løgtinginum.

Harra formaður. Í valskeiðnum 1980-1984, tá tað sokallaða borgarliga alternativið ráddi fyri borgum, tá trífaldaðist uttanlandsskuldin. Hetta vildu vit gera nakað við og sa,mett við seinasta valskeið, er uttanlandsskuldin í hesum valskeiði vaksin við minni enn hálvthundrað procentum. Um árskiftið væntast hon at verða 4 og eina hálva mia.kr. Skuldu vit trífaldað ta uttanlandsskuld, ið var tá vit komu til so hevði talið í dag verið 10 mia.kr. Sostatt kunnu vit vera rættiliga væl nøgd. Og kortini kann sigast, tá tú setur tær eitt stavnhald, so skal tú hava okkurt betri at meta teg við enn tað váraligasta, tú hevur møtt.

Javnmeta vit okkum við grannalondini, so er als einki at reypa av. Javnmeta vit okkum við Danmark, og hvat gjørt verður har við at venda rákinum, so eru vit eftirbátar, fylgja vit við, hvat verður gjørt og hvat danir halda politiskt frá vinstru til høgru, so kunnu vit ikki sláa okkum tols við okkara støðu uttan mun til, um vit eru svarskygd ella bjartskygd. Hugsa vit so um, hvat verður gjørt í grannalondunum til tess at tálma íløgurnar og nýtslu, so kundi har verið skynsamiligari farið fram, nógv av teirra tiltøkum hava ført við sær arbeiðsloysi.

Hesa dýru loysn halda teir seg noyddar at taka hóast, uttanlandsskuldin har lutfalsliga og har er tað Danmark eg hugsi um, er 50% minni enn hjá okkum pr. íbúgva. Í altjóð samhangi verður hetta hildið at vera ein sera álvarsom og syndarlig støða, men, sum nevnt, vit liggja 50% hægri enn teir. Hjá okkum hava íløgurnar ført við sær innflyting av arbeiðsmegi, hvørs avleiðingar vit enn ikki eru fullgreið yvir. Donsku vísmennirnir hava ávara okkum, og seinastu ávaringina fingu vit í gjár frá okkara egna landsbankastjóra, ið sigur, at okkurt nýtsluavmarkandi tiltak má gerast.

Vit mugu eisini fult og heilt taka undir við landsstýrinum, tá ið sagt verður, at samtyktu íløgurnar mugu toyggjast út yvur 8-10 ár heldur enn 5-6 ár. Grundsjónarmiðið eigur altíð at verða, at vit mugu liva av tí, ið hetta okkara ríka land er ført fyri at framleiða. Tað ber ikki til, at vít upp á eitt ættarlið hava vent hugburðinum soleiðis, at tað er púra náttúrligt at forskulda fleiri ófødd ættarlið, tað ættarliðið, sum var undan okkum, hevði sum meginstavnhald at fara skuldafrír í moldina. Tað má kunna finnast ein háttur at liva uppá, ið liggur í millum hetta at hava met í skuld og hitt at vera púra skuldafrír, uppskriftin er einføld antin at framleiða meira ella bróka minni. Tvørleikin kemur, tá ymisku politisku ynskini skulu nøktast, tað er einki at taka seg aftur í, at vit eru øll líka góð ella vánalig, tá tað kemur til henda spurning, bæði í samgongu og í andstøðu.

Pakkaloysnirnar hava verið við at forkoma okkum, einasta gongda leiðin er, at vit broyta stýrislagið soleiðis, at einstøku landsstýrisfólkini hava ministeriella ábyrgd og ikki ábyrgd í felag. Tíðin er farin frá kolegialskipanini, sum fráliður verður valla nakar, ið hevur hug at verða landsstýrismaður ella landsstýriskona og lata hendingar fara fram, ið eru beinleiðis í stríð við politiska og persónliga samvitsku. Hetta eiga allir flokkar at umhugsa álvarsliga undan valinum. Slík broyting skal sum kunnugt samtykkjast av tveimum løgtingum, til kunningar kann eg siga, at hetta mál fleiri ferðir hevur verið viðgjørt í løgtingsins grannskoðaranevnd, har 4 teir størstu flokkarnir eru umboðaðir, og hóast tað er ein skurvut forsamling, so eru vit púrasta samd um, at vit eiga at

hava ministriealskipan í staðin fyri núverandi kolegialskipan.

Harra formaður. Nú vit eru í 12. tíma og vit so mangan hava sæð, at so mangt hendir, ið ikki átti at verið hent, tað hendir so mangt, sum ikki átti at verið hent tí at valið nærkast.

So fari eg at loyva mær at minna á fráfaringarsamrøðu Jákups Sverra Joensen við Sosialin í apríl í ár, tá hann sigur, at vit skulu lata part av flotanum fara á húsagang. Í somu viðtalu sigur harn eisini, at okkara veiðiorka er í millum 30 og 50% ov stór, hann leggur aftrat, at tað als ikki hevði skatt okkum á nakran hátt, um vit heilt sleptu ella hildu upp at ella steðgaðu í hesum ári við nýíløgum í skip.

Um hetta sama mundið, sum Jákup Sverri Joensen sigur hetta, síggja vit í tíðarritinum Fiskirannsóknir Hjalta í Jákupsstovu skríva, at fiskiskipaflotin eigur at verða minkaður við einum fjórðingi ella einari helvt. Hetta er greið støða harra formaður. Vit vita, at 100 mió.kr. restaðu í hjá fiskiskipaflotanum í fjør og tað verður ikki minni í ár. Í vár fingu vit eisini at vita, at tað er eingin skipabólkur, sum klárar seg í løtuni, tað er tí at vóna at orðini hjá fiskivinnufrøðingunum verða havd í huga, tá serlánini skulu veitast. At vera ov gávumildur í 12. tíma, man vera stokkutu hiti. Vit áttu nú av royndum at verið so fræg, at vit vita, at møguligt er at steðga ferðini uttan at bakka. Í meira enn 2 ár hava vit liva við merglopi, merglop er eitt frálíkt orð, ið eisini ofta verður kallað voksverk, men tað er merglop á føroyskum, og hetta merglop má steðgast, eingin kemur væl frá slíkari framferð í longdini.

Harra formaður. Eg undrist á, at eitt so stórt og kostnaðarmikið verk sum heilsu- og sjúkrahúsverkið als ikki eigur sína serligu umrøðu í løgmansrøðuni. Greitt er, at nakað stendur um hetta í fylgiskjølunum. Heilsuverkið er eitt ógvuliga dýrt øki ikki minst sjúkrahúsverkið, ið kann sigast at hava verið eitt lík í lastini hjá trimum teimum seinastu samgongunum. Longu í 1980 fingu vit stungið út í kortið frá tí veruligu ráðleggingarnevndini fyri sjúkrahúsverkið, hvussu hetta skuldi útbyggjast, avgerðin er ikki tikin enn í hesum málið. Seinasta samgonga kom við einum pinkuáliti í september 1984 við Jógvan Sundstein sum formanni. Og henda nevndin útsetti avgerðiha, henda samgonga fekk eina nýggja ráðleggingarnevnd í endaði við at biða um eina nýggja verkætlan frá Dansk

sygehusinstitut. Henda verkætlan er komin, men enn er eingin avgerð tikin. Landsstýrið hevur sett pengar av til neyðuga endurnýgging, og tað er eyðvitað gott, men verulig prinsipiel avgerð um ætlanina er ikki tikin. Harra formaður. Vit kunna ikki loyva okkum alsamt at renna undan at tak prinsipiella støðu viðvikjandi, hvussu sjúkrahúsverkið skal skipast, uttan mun til hetta er torført, men tað er tað, vit sita her til. Hetta verður ikki sagt fyri at leggja stein oman á byrðu hjá avarandi landsstýrismanni, stóð tað til hansara, var avgerðin langt síðani tikin.

Harra formaður. Eg skilji annars, at nú er semja um at seta nýggjan sjúkrahússtjóra í næstum, hetta skuldi langt síðani verið gjørt. Eg heiti á tykkum um at lata vera við at gera fyri at tosa í beinleiðis máli, latið verða við at gera rossahandlar í hesum máli. Sjúkrahúsverkið er ryggbrotið, og um at bløða út vegna politiska mishandling, tað er av somu orsøk vorðið dýrari enn, tað átti, og eg stúri fyri, at kanska dygdin eisini er viknað. Eingin fer at øvunda tí fólki, ið skal átaka sær at stjórna sjúkrahúsverkinum. Nú bíðað hevur verið so leingi at taka prinsippavgerð í spurninginum um útbygging av sjúkrahúsverkinum, fari eg at minna á, at tá vit hava fingið yvirlæknar settar, tað hevur altið verið soleiðis, tá ið yvirlæknar skulu setast í størv, so er tað eitt fakligt ráð, ið ger meting um, antin hesin sami hevur fakligan førleika til at koma í slíkt starv, soleiðis hevur altíð verið. Til tess at fyribyrgja eitt krotiskt mið, tá talan er um sjúkrahúsverkið og sjúkrahússtjóra til miklan ampa fyri fólk, føðiland og heilsuverk okkara, so fari eg at loyva mær at biða tykkum um eina góðskumeting av serkønum á hesum øki viðvikjandi førleika hjá ti, ið skal átaka sær at verða sjúkrahússtjóri í staðin fyrí at fara at klandrast um politiskan lit, og er tað soleiðis, at landsstýrið ikki orkar at fáa ráð frá føroyskum stovni, so letur tað seg gera at fáa tað aðrastaðni frá. Vit eiga nógvar góðar grannar, og tá ið álitið frá tí føroysku ráðleggingarnevndini ikki kundi brúkast, um man vendi sær til DSI staðin fyri og faktisk fekk tey somu ráðini, so kundi man í hesum førum gjørt tað sama at spurt um førleikan hjá einum komandi sjúkrahússtjóra, men also íslendingar og norðmenn vilja helst eisini fegin hjálpa okkum við hesum.

Harra formaður. Latið landsstýrið medvirka í, at ikki okkara ungfólk støðugt siga, at tað ger sanniliga tað sama, um vit fáa eina útbúgving ella ikki í hesum landi, tað er politiskur litur, tað snýr seg um, og harra formaður, lat ongan ivast í, at hetta er ikki eitt partapolitiskt problem ella eitt samgonguproblem. Vit hava staðið og hugt at í áravís, hvussu tað fyrigongur við slíkum starvsetanum og tað er væl meint, og eg skal ikki renna undan nakrari ábyrgd, tí vit øll eru partur í hesari søk. Harra formaður. Neyðars land og neyðars ungdómur, hetta er ikki serálop á samgonguna sum nevnt, vit kenna hetta spæl frá øllum samgongum, og tað skal bert ein til at byrðja henda vælkenda leik og so fer bólturin á rull.

Eg fari at nýta høvi til at takka landsstýrismanninum í heilsumálum annars, at 10 ára gamla uppsktotið um fyribyrgjandi kyknukanningar fyri lívmóðurhálskrabbamein av kvinnum millum 25 og 50 ár nú er vorðin veruleiki, og tað eru mong takksom fyrí. Eg veit, at har hava verið trupulleikar men tað eydnaðist hesaferð, hjartans tøkk.

Harra formaður. Eg haví orðið eg fari eisini at nýta høvi til at takka landsstýriskonuni fyri dygdargott arbeiði. Hevði hon ikki verið so støðuføst, so vóru upp aftur størri íløgur gjørdar. Broytingarnar í skattalógini hava verið til mikla hjálp fyri búskapin, og harumframt hevur fjøldin fingið eina kenslu av at rættvísi er størri í ábyrgdarbítinum, tá talan er um skatt. Annars er alt, ið bendur á, at eisini andstøðan hevur lítið at finnast at viðvíkjandi førda búskapar-og peningapolitikkinum.

Tá vit hugsa um kjakið í gjár, so má man siga, at tað var ein tannleys forsamling. Anstøðuleiðarin tykist at útvikla seg til eitt vanligt grenj frá at hava verið ein argapisa. Einaferð enn verða tað farmaskipini, sum skulu hava tað, tað er skilligt at tey pína hann tí, tað er har, ið pínan skal sita, og har liggur ábyrgdin. Taka vit eitt nú "Helenu", sum vit øll eru hørm um, so stóð hon, tá hon fór uppá tvang í 90 mió.kr., og støðan er nú hon, at teir sum hava yvirtikið hana, biða eftir, at teir klára tað fyri 38 mió.kr. sum hon kemur at standa í. Sjálvandi hevði Pauli Ellefsen ongan førleika til at vísa arðar loysnir enn at seta dren í landskassan. Og haðani fer Pauli Ellefsen til arbeiðsmarknaðin samstundis, sum hann finníst at tí yvirupphitaða

arbeiðsmarknaðinum, so sigur hann okkum, at hann dugdi ráðini, tá hann var løgmaður, tá var tað javnvág í, og hann sigur, illar tungur vilja vera við, at tað var arbeiðsloysi, meðan hann var løgmaður. Harra formaður. Hetta vóru als ikki illar tungur, tað var ein seriøsur almennur stovnur sum kannaði arbeiðsstøðurnar hjá ungfólki millum 16 og 19 ár í árinum 1981 og 1982. Niðurstøðan var, at 300 ungfólk millum 16 og 19 ár vóru at meta sum arbeiðsleys, hetta kallar Pauli Ellefsen fyri eina náttúrliga legu, so vita vit tað. Fyri tjóðveldisflokkin skal eg heilsa og siga, at vit meta 300 arbeiðsleys ungfólk sum eina ólukku, tað er sera umráðandi at børn okkara hava nakað at fara upp til hvønn morgun, og at tey hava eina kenslu av, at tað er brúk fyri teimum í samfelagnum og at tey kenna seg at hava ein gerandisdag við meining í, tað er støða okkara tjóðveldisfólks, at arbeiði og býli er sjálvsagdur mannarættur fyri øll.

Landsstýrið eigur tøkk fyri, at roynt hevur verið at skerja lántøkurnar hjá kommununum, men tá bæði samgonga og andstøða ásanna, at búskaparliga støðan er yvirupphitað, so kunnu vit eisini tálma okkara virksemi og sópa fyri egnum durum. Sum áður nevnt, er gamalt, at politikarar verða ov gávumildir, tá ið valið nærkast. Uppskot mítt skal verða, at vit í verki vísa, at vit meina nakað við tað og í staðin fyri nú at fara og gjara út fara at prógva sparsemi og varsemi í verki, tað ber ikki til at siga, at vit brúka ov nógv, men at tað eru hini sum skulu spara, hví ikki kappast um at spara ístaðin fyri at kappast um at gjarða út sum eitt heilt nýtt hugskot. Um vit siga t.d., at vit nú skulu spara 300 mió.kr. so kann lykilin í fyrsya lagi verða, at tað er landið, kommunurnar og privata vinnan, sum gera tað, og at tað verður javnt býtt í mun til fólkatalið og har, tey búgva. Andstøðan hevur fært fram at vinnulívið liggur í andaleypi. Harra formaður. Tølini viðvíkjandi nýstovnaðum partafeløgum vísa als ikki tað, hesi árini, meðan vit hava sitið her, tey vaksa alsamt, so tað sær ikki út til, at nakar hevur mist mótið.

Ongastaðni í verðini hava vit tað so gott, harra formaður, sum í Føroyum og okkara skattatrýst er kortini minnið enn skattatrýstið í Danmark. Tey skulu ikki verða fyrimynd okkara, men hetta er ósømuligt, tá hugsað verður um danska íkastið til

Føroyar. Hvørt mansbarn man duga at siggja, at hetta kann ikki halda fram, tað var longu í seksti árinum, harra formaður. So bíði eg um orðið aftur, harra formaður.

Tórálvur Mohr Olsen (jv.)

Harra formaður.

Henda løgmansrøðan er eitt sindur øðrvísi enn tríggjar tær seinastu í hesum her valskeiðunum. Tað er kanska ikki so løgið, tí í hesi løgmansrøðuni verður tikið saman um, hvat ið fekst av skafti hesi skjótt farnu 4 árini.

Tá ið henda samgonga var skipa eftir seinasta løgtingsval av trimum og einum hálvum flokki, var ein klárur yvir, at tað kundu koma at uppstanda trupulleikar millum flokkar við so ymiskum sjónarmiðum. Hesir trupulleikar hava eisini verið, men tó ongantíð størri enn borið hevur til at stýrt samfelagnum hetta tíðarskeiðið, og fyri størsta partin at náða tey mál, sum sett vóru.

Løgmaður byrjar eisini sína frágreiðing við at vísa á, at sjáldan er so stórur partur av einum samgonguskjali veruleiki, sum í hesum tíðarskeiði.

Við byrjan av hesum samgonguskeiði, um árskiftið 1984 og 1985 vóru fíggjarviðurskiftini sera trupul. Uttanlandsskuldin var í einum 4 ára skeiði vaksin úr 1 mia.kr. upp í 3 mia.kr. og fryktandi var tað fyri, at hesin vøkstur kom at halda á fram við somu ferð, møguliga heilt upp til 6 mia. Tí betur hevur tað eydnast at tálma hesum vøkstri, so at hesin vøkstur ikki er vorðin meira enn helmingurin av tí, sum roknað var við. Men hesin vøkstur er framvegis ov stórur og verður hetta ein uppgáva hjá komandi samgongu at seta tiltøk í verk fyri at fáa javnvág í millum inn og útflutning. Í hesum landsstýrisskeiði eru inntøkurnar hjá landskassanum vorðnar munandi størri. Hetta stavar frá at tollur og onnur avgjøld eru hækkað, men hesum øktu inntøkum hevur verið brúk fyri, tá ið hugsað verður um tær veðhaldsskyldur, sum eru vorðnar effektivar.

Hesar veðhaldsskyldur stava frá skeivum íløgum serliga frá seinasta landsstýrisskeiði. Fyri at nevna nøkur tøl, so eru nýttar umleið 600 mió.kr. seinastu 8 árini, harav tann størsti parturín hesi 2-3 seinastu árini. Av hesum 600 mió.kr. er tann størsti parturini fingin til vega í hesum landsstýrisskeiði, so tær øktu inntøkurnar hjá landskassanum eru fyri størsta partin farnar til at gjalda fyri veðhaldsskyldur. At gera skeivar veðhaldsíløgur verður

torført at sleppa undan, og sleppur verandi samgonga heldur ikki undan hesum, men ein skal altíð tora at viðganga, at so er, men tíverri her haltar hjá ávísum persónum og flokkum.

Ein orsøkin til, at ikki hevur verið møguligt at fáa betri tamarhald á figgjarviðurskiftunum er tað ovurhondsstóra byggivirksemið, sum hevur verið tey seinastu árini. Men eg meti, at hetta byggivirksemið sum frá líður man fara at minka, tí tað figgjarliga grundarlagið verður ikki til staðar, og eg eri samdur við løgmann í tí, at fløgurnar muga toyggjast yvir eitt longri áramál, og metast má um, hvat ið er mest neyðugt, og hvussu inntøkumøguleiðarnir verða framyvir og tað avhongur framvegis av, hvussu veiðumøguleikarnir verða og hvat høvuðsvinnan kann geva av sær.

Tað hevur altíð verið so, at fiskivinna hevur verið eitt ótrygt grundarlag at byggja á, hetta veit ongin betur enn føroyingar, ið hava verið so nær knýttir at hesi vinnu. Tað er so nógv, sum kann ávirka, vánalig fiskiár, lágur søluprísur á heimsmarknaðinum, hækkaðar útreiðslur, sum t.d., tá í oljan dýrkaði út um alt mark og so nógv onnur viðurskifti, sum vit onga ávirkan hava á.

Í løtuni eru umstøðurnar hjá fiskivinnuni ikki góðar. Høvuðsorsøkin í dag eru lágir søluprísir, fiskaloysi eystanfyri og mistir veiðumøguleikar við New Foundland. Føroyaleiðirnar hava í ár givið nakað tað sama í nøgd, sum í undanfarin ár, men her eru trupulleikarnir teir, at veiðiorkan er ov stór, so ov lítið verður í part til tað einstaka skipið, og tað er einki at taka seg aftur í at siga, at hetta eru sjálvskaptir trupulleikar. Vit hava ikki megnað at laga veiðiorkuna til tær fiskinøgdir, ið vit ráða yvir á egnum grunnum, avleiðingarnar av hesum hava verið, at ein ovurfisking er farin fram. Vit kunna ikki umbera okkum við, at vit ikki høvdu møguleikan at finna fram til tað røttu skipanina, men sum sagt, vit megnaðu ikki at halda aftur.

Tað eru komin ov nógv skip inn á grunnarnar, tann stórsta økingin í skipatalínum fór fram í tíðarskeiðnum 1980-1984 og við fiskiloyvum, tá vórðu givin og sum seinni eru komin inn í heimaflotan. At minka um veiðiorkuna er lættari sagt enn gjørt. Tað hava verið ymisk uppskot og tankar frammi um, hvussu hettar letur seg gera, sum t.d. at avmarka veiðidagatalið. Sjálvur meti eg ikki, at hetta er nøkur gongd leið, tí ein fyritreyt fyri at fáa eitt veiðifar at bera seg

er, at tað hevur møguleikar at veiða alt árið. Eitt, sum henda samgongga setti sær fyri, var ikki at økja um veiðitrýstið, men hin vegin heldur minka tað, og her kann vísast á ávís úrslit.

Tað er so, at tað altið má fara ein ávís útskifting fram i einum veiðiflota. Henda útskifting er farin fram soleiðis, at fyri at fáa nýtt skip so skal annað skip, fara úr veiðiflotanum, og eisini hevur verið hugsað um at flyta veiðitrýstið út á djúpari vatn.

Fyri at lætta um okkara egnu grunnar hava fleiri av teimum stóru djúpvatnstrolarunum fingið loyvi eina ávísa tíð av árinum at veiða av ti kvotu, sum vit høvdu eystanfyri. Tað er ikki so langt síðani, at fiskiveiða við Grønland var høvuðsálitið hjá føroyingum.

Ymisk viðurskifti so sum, at Grønland gjørdist limur í EEC og at toskastovnurin av náttúrgivnum viðurskiftum minkaði ja næstan hvarv, hava gjørt, at henda veiða heilt er hildin uppat, men tíbetur sær út nú sum, at føroyingar kunnu koma við aftur. Toskastovnurin í Grønlandi er í skjótari menning og tað er alt, ið talar fyri, at vit kunna flyta ein part av okkara veiðiorku til Grønland í samvinnu við Grønlendingar. Nordafarstøðin í Føroyingahavnini hevur nú í nógv ár ligið still. Javnaðarflokkurin hevur altíð havt ta støðu ikki at sleppa teimum rættindum, sum vit høvdu. Tað er alt, sum týðir uppá, at henda meting hevur verið rætt, og at her liggja stórir framtíðarmøguleikar. Á verandi figgjarlóg standa 40 mió.kr., ætlaðar til at keypa veiðiorku úr flotanum, har aftrat hevur landsstýrið heimild at lána upp til 30 mió.kr. til sama endamál, so at til taks eru 70 mió.kr. til at minka um veiðitrýstið. Onnur tiltøk koma eisini at virka frá komandi ári so sum størri meskavídd og mínsta mát av fiski, ið kann avreiðast, so man kann ikki siga annað enn, at hetta landsstýrið, hevur havt ein fiskivinnupolitikk, sum hevur miðað í móti at minka veiðitrýstið, sum allir eru samdir um, er ov stórt.

Alivinnan, sum varð sett so stórtálit til, hevur ikki givið tað sum væntað varð. Orsøkirnar eru ymiskar at byrja við vóru trupulleikar við, at so lítið av smolti var til taks, hesi viðurskifti eru nú í lagi. Sjúka innan fyri alivinnuna hevur forðað fyri, at úrtøkan bleiv tað, sum væntað varð, men hugsast kann, at sum frá líður verður vunnið á hesum trupulleikum og at alivinnan í framtíðini kann geva eitt munagott íkast til landshúsarhaldið.

Vit hava í

nógv ár havt fiskiveiðiavtalur við onnur lond, hesir sáttmálar hava, sum frá er liðið, minkað, tó hevur tað eydnast í hesum landsstýrisskeiði at fáa nøgdirnar í hesum veiðisáttmálum at kvinka uppaftur, hetta er komið væl við hjá fjarfiskiflotanum.

Tað hava verið søgd nógv orð undir hesum her orðaskifti, men eg haldi ikki, at tað hava verið tær stóru atfinningarnar at løgmansrøðuni, og eitt sum hevur verið nokk so merkiligt undur orðaskiftinum, sum fór fram í gjár, at tað vóru ongar viðmerkingar. Hetta er nakað nýtt her í tinginum, eg rokni bara við at tað man boða frá, at menn eru nøgdir við tað sum løgmaður segði á Ólavsøku. Men eg kundi hugsað mær at komið við einari viðmerking, og tað var til Flemming Mikkelsen, tá ið Flemming Mikkelsen í gjár hevði orðið, so fanst hann at ymiskum, sum var hent og annað sum átti at verið gjørt, har í millum kom hann inn á ferjulegu við Gomlurætt og segði orðarætt:"Ferjulega við Gomlurætt er eitt neyðaregg og eigur onga framtíð." Nú veit eg ikki, hvussu Flemming Mikkelsen begrundar hendan pástand tað, at Sandoyggin í framtíðini skal fáa eitt betri ferðasamband, tað hevur leingi verið eitt ynski hjá teimum, ið búgva í Sandoynni, at stytta um farleiðina sjóvegis. Øll tey politisku feløgini í oynni eisini sambandsfelagið hava kravt eina loysn á hesum málið. Seinasta samgonga, hvar Flemming Mikkelsen var ein partur, megnaði ikki at ganga hesum ynski á møti. Henda samgonga setti sær fyri at loysa málið og at byggja ferjulegu við Gomlurætt, í staðin fyri í Kirkjubø, og byrjar hetta arbeiðið ein av fyrstu døgunum. Tað er harmiligt, at hetta arbeiði ikki er byrjað fyrr, men her hava tíverri verið nógvar forðingar á vegnum, sum nú eru loystar. Tað hevur verið ført fram, at hetta er ein nógv dýrari loysn enn at byggja í Kirkjubø, tað er møguligt, at henda bygging er nakað dýrari, men tað er ilt at siga, hvussu nógv, tí vit hava einki samanlíkningar grundarlag. Tað vísti seg, tá ið samgongan fór at viðgera tey tøl, sum lógu til grundarlag fyri bygging í Kirkjubø, at tey hildu als ikki, so tað er eingin, sum kann siga, hvussu nógv dýrari tað er at byggja við Gomlurætt. Sjálvur meti eg, at sum frálíður, koma vit at ásanna at hetta her var tann besta loysnin.

Lat meg enda við at siga, at henda samgongan, sum eg sjálvur havi verið ein partur av, hevur havt eina positiva innstilling fyri tí valdømi, sum

eg havi umboðað, á samferðsluøkinum havnajáttanir, læknaviðurskifti og so nógv annað, og tað vil eg takka henni fyri

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður.

Áðrenn eg fari at viðgera røðuna hjá løgmanni, so havi eg onkra lítla viðmerking, sum vit ikki høvdu høvi til at koma fram aftur við í áðni og tað var fyrst og fremst tað, sum Heini O. Heinesen snakkaði um skattaeftirstøður, og niðurstøðan hjá honum var, at um man ongar skattaeftirstøður hevði, so hevði man einki at lána uppá, tað kann verða nakað um tað, men hevði man einki at lána upp á og hevði man ongar skattaeftirstøður, so hevði man ongar pengar, tí hevði man pengar, so vóru teir brúktir, tað vóru orðini og tað er júst, sum vit í Fólkaflokkinum hava inntrykk av, at sitandi samgonga førur út í verki. Teir hava tikið nógvan pening inn í landskassan, men hann blívur ikki liggjandi har hann fer so sanniliga útaftur í forbrúk og vit siggja nú á fíggjarlóginí 1988 hon er fullbókkað.

Og so er tað nakað, sum Karin Kjølbro ferð eftir ferð hevur sagt, hon segði tað aftur her í dag, hon helt at vinnulívið, tað mátti hava tað gott tí, at tað vóru so ógvuliga nógv nýggj partafeløg stovnað, also barametrið hjá henni var bert, at um tað vóru nógv partafeløg stovnað, so hevði o vinnulívið tað gott, so var íløguhugurin til staðar. Vóru eingi partafeløg stovnað ja, s var eingin íløguhugur. Nei, so einfalt er tað heldur ikki, tí tann størsti parturin er av neyð, fyri at menn yvirhøvur kunnu koma burtur úr hesum tingunum. Ja, tað kann gott , difinera eitt sindur Sverri Midjord, tað er einki problem, tað er soleiðis í dag, at tann, sum hevur eitt vinnutól er í dýrastu neyð, um tað er eitt r skip, virkið ella, hvat tað er

r

Likviditeturin hjá hesum he feløgum er so út av lagi vánaligur og persónlig kautiónin e so óvanliga stór, at menn fyrið eir og hvønn prís royna at sleppa sær burtur úr tí. Og er tað gjørligt, so koyra teir t yvir á eitt partafelag, sum avmarkar hesar her ábyrgdirnar eitt lítið sindur, men sum regul, so hanga teir ógvuliga fastir í veðhaldinum. -

Harra formaður. Hetta er 4.i løgmansrøða hjá sitandi samgongu og í røðuni sigur so løgmaður frá sini metan av støðun í Føroyum í løtuni. Hyggja vit aftur at løgmansrøðuni i 1985 og samanlíkna hana við 1988 ja so er siktið heilt klárt.

Í 1985 minnast øll, at Atli

Dam her frá tingsins røðara-palli málaði støðuna sera dapra. Vit høvdu investera ov nógvar pengar, vit brúktu ov nógvar pengar, og løgmaður gekk enn tá so langt, at hann útrópti Føroyar til eina bananrepuplik.

Í 1988 er eitt lítið síndur ørðvísi taktikkur brúktur í hesu løgmansrøðuni. Her roynir løgmaður í fyrstu atløgu at mála tað ljósareytt. Men hetta eydnast ikki serliga væl, tí lesa vit hana fleiri ferðir ígjøgnum, so siggja vit, at á flest øllum vinnuøkjum, á flest øllum økjum, sum skulu skapa virðini, sum skulu gjalda alt tað føroyska húsarhaldi, fram-eftirni, har stendur rættiliga illa til.

Tá ið tað er avmarkað tíð, ið vit fáa her, so vil eg bert koma inn á nøkur av hesum málunum.

Løgmaður byrjar í løg-mansrøðuni við figgjarviður-skiftunum, og hann nevnir uttanlandsskuldina, og uttan-landsskuldin verður sum regul brúkt sum eitt barometur fyri støðuni hjá Føroyum. Hon er við árslok 1988 mett til at vera 4,6 mia.kr., men tað er ikki øll skuldin, tí her er frátrekt tað, sum føroyingar eiga uttanlands m.a. teir føroysku peningastovnarnir, sum eru til-samans uppá 1,4 mia.kr. so samlaða uttanlandsskuldin er 6 mia.kr. í dag. Av hesum 6 mia. har stendur vinnulívið fyri 3,6 mia.kr. og tað eru tey lán, sum vit hava tikið uttanlands til at skapa vinnutól, sum skulu produsera, sum skulu forrenta og sum skulu gjalda avdrøg av hesum lánum. Restina eiga so almennir, hálvalmennir stovnar og kommunur, og eg kann beinanvegin siga, at landskassans skuld er rættiliga lítil partur av hesum her, hon er kanska einar 200-300 mió.kr.

Tann ógvuliga stóra uttan-landsskuldin, sum vinnulívið hevur, má og skal fáa møguleika tíl at forrenta hesi lánini og gjalda tey aftur, annars verður gálið tað vita vit, og tað var júst tað, sum herdi við farmaskipaflotanum, tað góvust ikki møguleikar hjá farmaskipa-flotanum hvørki so ella so til at halda sínar skyldur, og tá ið man so royndi at fáa eina politiska loysn soleiðis, at vit varðveittu hesi skipini í landinum, so varð eisini tað kastað fyri borð.

Lat okkum venda aftur til uttanlandsskuldina, sum er upp á 4,6 mia.kr. og so verður hon samanlíknað við skuldina 1. januar 1985. Tað eru fleiri røðarar, sum hava verið uppi her og sagt, at í 1985 stóð alt so ógvuliga illa til, tá var uttanlandaskuldin ca. 3 mia.kr.

Men vit skulu hava í huga, at inni í hesum 3 mia.kr. er eitt tal upp á 510 mió.kr., sum er kurstap, sum er roknað, men sum ikki er fallið til gjaldingar so, at veruliga uttanlands-skuldin var 2,5 mia.kr. tá. Men skulu vit samanlíkna so lat okkum samanlíkna. Vit siga, at í 1985 var skuldin 3 mia.kr. 1. januar 1985 nú er hon 4,6 mia.kr. aftrat hesi skuld skulu vit so leggja 510 mió.kr. sum høvdu í kurstapi, sum varð innroknað í okkara 3 mia.kr. plus tað, sum hesi 3 seinastu árini hevur verið tað mótsatta, so kursvinningur hjá sitandi samgongu upp á 343 mió.kr. til samans er so her ein munur upp á 853 mió.kr. og hetta eru tøl, sum standa í fylgiskjølunum til fíggjarlógina. Haraftrat skulu vit so minnast til, at sáttmálar í Noreg upp á skip, sum vóru gjørdir, men hvar skipini ikki vóru avleverað. gjørdu, at vit fingu ein ávísan kursvinning og tað vóru fleiri skip, sum høvdu ein kursvinning, sum lá í millum 10, 12 og 15 mió.kr.. Seta vit hesi her tølini til ca. 70 mió.kr. tilsamans so er tað á einari leið.

Hartil skulu vit so eisini minnast til, at 1. januar 1985 høvdu vit aktiv fyri 1,5 mia.kr. í farmaskipaflotanum. Hesi aktivini eru ikki til í dag og tí eru tey ikki viðroknað í uttanlandsskuldin Høvdu vit hesi skipini til hatta virði, so hevði uttan-landsskuldin eisini verið upp á 1.5 mia.kr. større. Tað vil siga, at vit skulu leggja hesar her 853 mió.kr. saman við 70 mió.kr. plus 1,5 mia.kr., so koma vit upp á 7 mia.kr. og tað og samanlíkningargrundarlagið.

Eg sigi ikki, at tað er so ógvuliga stórt tal heldur, men tað, sum er avgerandi, er tað at hesar investeringarnar eru førar fyri at forrentað seg og rinda aftur. Har er eitt sindur torgørt at fáa eyga á ein glotta. Tí tær investeringarnar, sum eru gjørdar undir hesi samgonguni, siggja ikki út til, ið hvussu so er í fyrstu atløgu, at klára hensa forrenting.

Nú veit eg eisini tað, at útflutningurin til USA er minkaður av tí, at dollarin er lækkaður, men vit hava eisini annað sum ávirka hinvegin m.a oljuprísurin, sum er faktisk í dag er ein triðingur av tí, sum hann var fyri 4 árum síðani, so tað nógva í hesum útrokningin verður eitt met, men eg haldi sjálvur, at teir ógvuliga stóru uttan komandi trupulleikar ið vit høvdu at dragast við í seinastu samgongu, samanborið við teir ógvuliga góðu uttan-eftir komandi møguleikum hjá

sitandi samgongu, tað er øll forkláringin uppá, at tað er ein lítil glotti í fíggjarviðurskiftunum, og so er tað sagt.

Men tað, sum hevur ávirkan á her á Føroya Løgtingi er, hvussu vit húsast við okkara egnu pengum, og har er syndarliga illa statt. Um vit nú hyggja at fíggjarlógaruppskotinum fyri 1988 og samlíkna tað við roknskapin fyri 1984 og 1985, so síggja vit, at rakstrarútreiðslurnar eru vaksnar nakað so heilt heilt, óforsvarliga nógv. Allar rakstrarútreiðslurnar á fíggjarlógini eru hækkaðar post fyri post frá millum 30% upp í 125% uttan ein grein, og tað er fiskivirknan, hon er lækkað í sama tíðarskeiði við 16%.

Aftur her eitt dømi um, at man hevur flutt kapitalin, flutt orkuna, flutt rentabilitetin frá vinnulívinum yvir til tað almenna. Eg kann bara nevna nøkur fáa dømir um, hvat ið hesar ymisku greinirnar eru vaksnar í hesum tíðarskeiði, m.a. er landsumsitingin vaksin við heilum 90%, mentamál eru vaksin við 125%, landbúnaðarmál við 47%, ídnaðarmál við 31% og heilsuskúlamál og almanna mál sum er eitt sindur ringt at gera upp einsæris, av tí at blokkstuðulin verður innroknaður, hesar triggjar greinirnar tilsamans eru vaksnar við 94%, tá ið blokkstuðulin er innroknaður, so her eru nøkur risa lop. Og so sigur onkur, at vit hava havt prisvøkstur í hesum tíðarskeiði, jú tað hava vit havt, men hyggja vit í fylgiskjølini til fíggjarlógina so síggja vit, at prísvøksturin frá 1985-1988 bert er 2.1%, so her er eingin forkláring uppá, at fíggjarlógin er vaksin so ovurhonds nógv.

Vit høvdu eitt uppskot um eina fíggjarlóg fyri 1988, sum hevði minkað um rakstrarútreiðslurnar hjá landskassanum við 225 mió.kr. og vit skutu upp, at hesin peningurin varð settur av til at standa í móti møguligum tapum ella møguligum útreiðslum til fiskivirknuna, sum vit vistu fór at koma og sum vit longu tá vildi leggja pening upp fyri til.

Tað, sum er sera álvarsligt við galdandi fíggjarlóg er, at hon opnar nýggjar møguleikar til uppaftur størri almennar rakstrarútreiðslur á komandi fíggjarlógum. Hesar almennu útreiðslurnar koma at verða so tyngjandi fyri føroyskan búskap í framtíðini, at tað verður ein spurningur, um vit fáa javnvág í fíggjarlógina fyri 1989, 1990 og so fram eftir uttan at tyngja um skattabyrðarnar, tollbyrðarnar ella verða noydd til lántøku. Hetta er tað allar

álvarsamasta í føroyskum fíggjarligum politikki, tað eru hesar útreiðslurnar, vit eiga at halda niðri á einum rímiligum niveau og orsøkin til, at tað hevur verið so sera lætt at økja hesar útreiðslurnar serliga seinasta ár er tað, at undanfarnu fíggjarlógir hava havt eitt stórt yvirskot. Tað yvirskotið er horvið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1988, og tá vit so hugsa um allar tær eykajáttanir, sum eru játtaðar í inniverandi fíggjarlóg, so tori eg her at pástanda, at sjálvt um vit hava ein størri skatt enn tað, sum nett varð í fíggjarlógaruppskotinum, so kemur fíggjarlógin 1988 at nava eitt hall. Og gongdin verður nógv verri frammeftir.

Vit skulu minnast til her á tingi eru samtyktir bæði skúlapakkar, samferðslupakkar, sjúkrahúspakkar, skipapakkar og so frammvegis, sum bindur løgtingið nógv nógv ár fram í tíðina, og kemur at føra til nógv, nógv størri útreiðslur á fíggjarlógini enn tær, sum longu nú eru har. Tíðin gongur bara so ótrúliga skjótt, at man kemur ongan veg í øllum hesum her. Ja takk harra formaður. Eg má fara at biða um orð aftur og koma inn á onkur onnur mál, sum eg ætlaði at røða eitt sindur um. Takk fyri, harra formaður.

Sverre Midjord (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var Anfinn Kallsberg, sum segði, at vinnutólini vóru í dýrastu neyð og teir vóru noyddir fyri ein hvønn prís at sleppa sær burtur úr tí, so var at stovna partafelag. Tað vil siga, at teir borgarligu hava eina loysn upp á tann búskaparliga politikkin, tað er at stovna partafeløg fyri at sleppa frá at gjalda til tað almenna.

Tað vil so siga í øðrum føri, at tann vanligi løntakarin, arbeiðsmaðurin, sum ikki hevur møguleika at stovna partafeløg, harn má bara gjalda.

Man má konstatera tað, at handa politikkin, Anfinn Kallsberg, hava vit fyri langara tíð síðan konstatera, og vit muga eisini konstatera tað at vanligur borgarligur politikkur verður ikki førdur her á løgtingi meira. Vanligur borgarligur politikkur her á løgtingi er tað, at landskassin skal taka um endan, og so skal man bara stovna partafeløg fyri at sleppa frá at gjalda til landskassan. Takk fyri, harra formaður.

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerking.

Harra formaður.

Tað er ótrúligt, at Sverri Miðjord ikki skal duga at innsíggja at uppgávan hjá Føroya løgtingi er at skipa fyri, at vit hava eitt sterkt samfelga í Føroyum. Við at skipa soleiðis fyri, sum hevur verið gjørt hesi 4 árini, hvar ið tað miðvíst hevur verið politikkurin at jarðleggja vinnulívið, hevur flutt kapitalin frá tí privata yvir til tað almenna, so er tað heilt klárt tað verður eingin, hvørki verkamaður ella nakar annar, sum hættar sær undir nakað vinnufremjandi tiltak í framtíðini, tað eri eg heilt sannførdurur um, tann sum eina ferð hevur verið í tí og er sloppin heilskapaður burtur úr tí, hann ger tað aldri aftur. Hetta her er bara tendensurin, í staðin fyri haldi, eg at tað skuldi verið okkara uppgáva sum politikara at stimulera soleiðis, at tað, sum skal skapa, tað sum skal bera alt hetta samfelagið allan okkara eksport, at tað far livimøguleikar, men tað hevur tað ikki í dag tiverri.

Jógvan Sundstein (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg vil fegin spyrja Sverra Miðjord: Hvussu stovnar man eitt partafelag fyri at sleppa frá at gjalda til tað almenna?

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Nú skal eg fyrst rætta samgongumanninum eina hond eg síggi, at ein floksfelagi hevur gjørt so væl at skriva mær niður, hvat Anfinn Kallsberg hevur sagt, tá eg havi tosað um, at talið á partafeløgum er vaksið í okkara valskeiði, so sigur Anfinn Kallsberg eftir tí, sum partamaður mín sigur, at hetta gerða fólk av tí beru neyð. Tá tey eru farin inn í vinnulívið, so gera tey eitt partafelag fyri at sleppa burturúr tí. Eg vildi eisini vita, hvussu tað var, so vit kunnu broyta tað beinanvegin, um tað er spekulatión í tí.

Harra formaður, tá eg annars bíði um orðið, so er tað hetta, at hatta er tvætl, at vinnulívið ikki fær ein almiklan stuðul úr landskassanum, og um vit ikki kyggja eftir lyklatølunum í fylgiskjølunum til løgmansrøðuna, so siggja vit, hvussu stór luttøka landskassans er í privata vinnulívinum.

Harnæst harra formaður. Tíðliga í vár, tá ið formaðurin í reiðarafelagnum verður spurdur av útvarpinum, hví teir eru so illir eftir at fáa skip,

hví teir vilja so illa hava nýggj skip konstant, hví vilja tit tað, so svarar formaðurin í reiðarafelagnum, tí tað er so lætt at fáa skip, ikki tí tað tænti fólki og føðilandi ella tað var skil í, men tí tað var so ógvuliga lætt, sig so tað, at hatta ikki letur seg gera.

Sverri Midjord (jv.) viðmerking

Ja, Jógvan Sundstein setti mær ein spurning um hvussu man slapp undan at gjalda skatt.

Eg haldi, at hann skal seta tann spurningin til Anfinn Kallsberg tí Anfinn Kallsberg, segði her, at vinnulívið mátti stovna partafelag fyri at sleppa sum frægast burtur úr tí. Harumframt vil eg siga tað, at man má konstantera at tann borgarligi politikkur, sum Christian Djúrhuus, sáli stóð fyri, tað sum ikki kundi standa, tað skuldi falla, tað eksisterar ikki her, tí landskassin stendur við endan.

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Nú er tað eitt sindur keðiligt, at Karin Kjølbro ikki var inni her, tá eg helt røðuna.

Tað, sum eg fyrst og fremst segði var, at tað undraði meg, at Karin Kjølbro ferð eftir ferð her frá tingsins røðarapalli brúkti, hvussu nógv partafeløg, ið vóru stovnað sum barometur fyri hvussu gott vinnulívið hevði tað, tí tað er ikki rætt.

Vinnulívið hevur tað ikki gott, tað vita øll, sum hava nakað við vinnulívið at gera, tað hevur tað ógvuliga ringt. Tá hon so nevnir hetta, at partafeløg verða stovnað av neyð, ja, tað er tað sum partamenninir hava skriva, so er tað møgulígt at tað kann útloysa tað, sum eg svaraði Sverra Miðjord aftur, at tey verða stovnað av neyð, men veruleikin er tann, at við at fara inn í eitt partafelag hevur tú avmarkað títt persónliga rísiko, og harvið hongur man ikki so fast í tí, sum man annars ger, tá man fer inn í vinnulívið.

Um vit hugsa um øll tey partsreiðaríini, sum hava verið, so er tað sorgarleikur. Hesir menn kunna verða fylgdir heilt á gravarbakka og hava ongan kjans at sleppa skuldafríir í grøvina. Tað er bara veruleikin, tað er bara so.

Partafeløgini, sum hava verið stovnað hesi mongu seinastu árini, hesi nógvu partafeløg, tað er hvørja ferð ein maður fær ein tanka um ay gera eitt ella annað, so sigua hann, ná, partafelag so er

avmarkað risiko, tí fara vit tann vegin. Tað, at fara úr eini fyritøku, sum Sverri Miðjord vil leggja tað út til, sum er komin í dýrastu neyð og yvir í eitt partafelag, tað ber als ikki til, tí tú skal hava ein partapening í einum partafelag og tað er absolut ikki við tí fyri eyga at snýta landskassan, at man fer úr einum privatum felag yvir í eitt partafelag.

Jógvan Sundstein (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg konstanteraði bara at Sverri Miðjord kundi ikki svara upp á spurningin, eg setti honum.

Jóngerð Purkhús (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var bara ein lítil viðmerking til Anfinn Kallsberg. Eg minnist so væl fyrstu ferð, eg var her uppi á røðarapallinum. Vit høvdu tað fyrstu løgmansrøðuna í hesum valskeiðinum til umrøðu, tá sóu vit, at tað gekk ikki serliga væl hjá farmaflotanum, og eg sigi so, og tað havi eg skrivað niður, at man átti at upplýst fólk betur um, hvat teir veruliga fóru inn í, tá ið teir arbeiddu við t.d. partreiðarrium, nú nevndi hann, at summi høvdu ongan livandi kjans nakrantíð at sleppa burturúr. Tá var einasti maður, sum fór upp á talarastólin at síga við meg, hvat eg líka sum bilti mær inn at koma við slíkum, sum hann nevndi nakað um, at har skuldi okkurt verða ólógligt o.s.f.

Eg segði ikki at tað var ólógligt, men um vanlig fólk seta pengar í eitt slíkt partsreiðarí, so kunnu tey koma so illa fyri, at tey hava ongan livandi kjans at koma burtur úr tí aftur og har eru vit komin út í. Eg haldi ikki, tað var so av leið, at eg bar hetta upp á mál tá. Tað var bara handan viðmerkingin, eg vildi síga.

Sverri Midjord (jv.) stutta viðmerking

Jógvan Sundstein, nei Sverri Midjord er ikki førur fyri at svara, hvussu man jongulerar við partafeløgunum, men tað kundi verið, at Jógvan Sundstein kundi gjørt tað, hann er statsviðurkendur grannskoðari og hevur helst havt nógv at gera við stovnan av ymiskum partafeløgum, um man hyggur í partafelagsregistarið.

Jógvan Sundstein (ff.) heilt stutt viðmerking

Harra formaður.

Ja, men tað var júst tí eg setti spurning til Sverra Midjord, tí eg arbeiði við nógvum partfeløgum, og eg veit ikki, hvussu man skal gera partafeløg fyri at sleppa at gjalda til tað almenna.

Sverri Midjord (ff.) heilt stutt

Eg haldi, at Jógvan nýttist ikki at fara uppá talarastólin og spurt um partafelagsstovnan, hann kundi spurt partamannin, siðumannin hjá sær.

Heini O. Heinesen (tf.) heilt stutt

Harra formaður.

Tað er ikki neyðugt hjá Jógvan Sundstein at koma upp her at spyrja, hvussu man stovnar partafeløg, tað veit hann ógvuliga væl.

Jógvan Sundstein veit væl tað, at eitt partafelag, tað er ein juridiskur persónur, sum man sigur, og um eitt partafelag fer á heysin, so verður tað tann juridiski persónurin, sum fer á heysin, og tann, sum tá stendur við veðhaldinum, sum tað vanliga er landskassin, hann skal so betala gildið. Hatta har er svarið uppá hatta har, hatta er ikki skattur, talan er um.

Jógvan Sundstein (ff.) seinastu viðmerking

Harra formaður.

Tað eru nú, eg veit ikki, hvussu nógv partafeløg her í landinum, tað eru væl í túsundvís, og tað eru bara í nøkrum heilt fáum førum, at landskassin veðheldur fyri partafeløg, tað er óvanligt, tá man tekur talið av partafeløgum. So tað er heilt skeivt, tá ið Heini O. Heinesen sigur hatta, sum hann sigur.

Lasse Klein (sj.)

Harra formaður.

Henda umrøðan av løgmansrøðuni er hin seinasta í hesum valskeiðnum, og tí er hetta orðaskiftið eisini longumerkt av hesum.

Ikki bert støðan í dag, men eisini hendingar, sum eru farnar fram, síðani henda samgonga varð skipað ái 1985, verða tiknar fram í løgmansrøðuni.

Sitandi samgonga hevur arbeitt út frá einum samgonguskjali, sum varð gjørt í 1985, og nú valskeiðið er nærum runnið, kunnu vit bert einaferð enn ásanna, at sjálðan eru so stórir partar av einum samgonguskjali vorðnir veruleiki sum hesaferð, umfrant tey mongu málini, sum ikki vóru raðfest í hesum skjali, men sum semja er fingin um. Sjálvt um stórir trupulleikar hava stungið seg upp, so hevur tað kortini eydnast at loyst hesar, sjálvt um búskaparviðurskiftini

ikki altíð hava verið til vildar.

Tað er væl eingin av okkum, sum í dag er nøgdur við tey úrslit sum rokkin eru ella tað støðið, sum vit í dag standa á. Okkum øllum stendur púra greitt, at rúgvan av óloystum spurningum er stór í vavi, og at tað skal skipast so fyri, at hesir verða loystir í komandi tíðum. Kortini eigur hvør einstakur av okkum at fegnast yvir, at orkan til at loysa hesar mennist dag frá degi og ein partur av orsøkini til, at rúgvan ikki minkar munandi er, at endamálið, málsetningurin við øktari orku verður størri og størri ár undan ári. Seinastu árini hava verið merkt av broytingum í vinnumøguleikunum og merkt av teirri óvissu, vit hava verði noydd at liva undir viðvíkjandi hesum broytingum, soleiðis hevur tað altíð verið og soleiðis kemur tað væl altíð at verða.

Alt okkara samfelag er grundað á, at nærum øll framleiðsla skal útflytast og nærum øll nýtsla innflytast, meðan arbeiðstreytirnar eru tengdar at sáttmálaviðurskiftunum við granna og viðskiftalond.

Tað eru stórar broytingar farnar fram innan tað økið, sum Sjálvstýrisflokkurin hevur umsitið, og fari eg náttúrliga nú at greiða frá nøkrum av teimum, og í hesum umfari eru tað samskiftisviðurskiftini, sum standa fyri tørni.

Harra formaður. Samferðslusøga føroyinga er vorðin nógv ríkari, nú vit sjálvir hava sett á stovn egið og føroyskt flogfelag Atlantic Airways. Longu tann 11. juni í 1976 var okkum greitt í fólkatingskunngerð, at 1. oktober í 1985 varð einkarrættur DDL at reka innlendis ella altjóða rutuferðslu í og úr Føroyum tikin av. Sjálvt um vit føroyingar høvdu hesa vitan í meira enn 10 ár so vóru kortini ongar fyrireikingar gjørdar, fyrr enn henda samgonga tók sær av málinum og longu 26. mars í ár kom tað flogfarið British Airspace 146 hjá Atlantic Airways til Føroyar, og longu 28 mars byrjaði regluliga rutuflúgvingin Vágar Keypmannahavn. Avtalan inniber, at vit føroyingar eiga

51% av partapeninginum í Atlantic Airways og at Cimber eigur 49% og at vit føroyingar kunnu yvirtaka partin hjá Cimber tá ið nøkur ár eru liðin. Eisini fevnur avtalan um, og tað er tann mest týðandi tátturin í hesum, at tað danska felagið skal átaka sær at útbúgva føroyingar innan loftferðslu, flogskiparar, mekanikarar, flogternur, fyrisiting og onnur neyðug starvsfólk, sum skulu til fyri at reka eitt vælvirkandi flogfelag. Talan

er um eini 20-25 fólk tilsamans.

Sum kunnugt er, Cimber Air dømt at fara úr samarbeiðnum við Atlantic Airways og í løtuni verður arbeitt fyri at finna eina loysn á hesum spurningi.

Ein annar merkisdagur í flogsøgu føroyinga man ivaleyst verða 1. december 1985, tá ið vit sjálvir yvirtóku opprativu teknisku umsitingina av tyrlutænasturi her á landi. Dagurin, tá vit føroyingar fyri fyrstu ferð stóðu á egnum beinum, tá ið tað sníði seg um flogferðslu og árið, tá ið samráðingar um føroyska luttøku í millumlanda flogferðslu byrjaði og sum kunnugt í dag er veruleiki.

Men áhaldandi og miðvíst hevur verið arbeitt við at útbyggja tyrlutænastuna soleiðis, at vit í dag við Snípuni og Vípuni við góðari samvitsku kunnu siga, at vit hava vunnið framá, sjálvt um týðandi spurningar eru eftir at loysa.

10. januar í ár kom so Vípan til landið, og hetta ger tað møguligt, at vit føroyingar sjálvir hava ábyrgdina fyri sjúkraflutningi, at flogið verður fyri at verja okkara egna sjónark, at gera uppgávur fyri stovnar, feløg og einstaklingar ger tað møguligt altíð at hava eina tyrlu tøka, tá ein av hinum er til lógarfest eftirlit ger tað møguligt at spara upp til 2 mió.kr. árliga í back-upp ella leigu útreiðslum, ella stívliga 8 mió.kr eftir 3-4 árum soleiðis, sum vit hava gjørt árini frammanundan, áðrenn vit fingu Vípuna. Ger tað møguligt at tryggja útoyggjafólki tryggan flutning alt árið. Vípan er sum kunnugt av sama slag, sum Snípan, er keypt úr Amerika og bygd í 1979, hevði tá flogið 3300 tímar og kostaði 6,5 mió.kr.

Hetta, at ein tyrla er komin aftrat, er í tráð við ynski h landsstýrinum um, at ein tyrla m.a. skal verða tøk alt døgnið til tær uppgávur, sum eg áður havi nevnt. Hetta letur seg ikki gera við bert einari tyrlu við tað, at ein tyrla skal verða til eftirlit og má sostatt takast úr flúgving fleiri ferðir um árið, av somu orsøk hevur tað verið ógjørligt at røkta allar tær uppgávur, sum heitt hevur verið á tyrlutænastuna um at gera. Tyrlutænastan flytur til Vágarnar so skjótt, hetta tekniskt letur seg gera. Eitt annað framstig í flogferðsluspurninginum er, at vit fingu tú nýggja lóg um loftferðslu, sum er komin í gildi í Føroyum. Hon kom ístaðin fyri lógina frá 1923 við seinri broytingum í 1937. Tá nýggja loftferðslulógin er sett í gildi við kongiligari fyriskipan og er tað lógin fr 1960 um loftferðslu við seinni broytingum.

Spurningurin um at seta nýggju loftferðslulógina í gildi í Føroyum hevur annars verið tengdur saman við spurninginum um millumlandaflúgvingina.

Telefonskipanin verður framhaldandi útbygd og í høvuðsheitinum sambært ta 5 ára útbyggingarætlan, ið var samtykt av løgtinginum á vári í 1986. Í mun til hesa ætlan eru fíggjarviðurskiftini munandi batnað grunda á lægri dollaravirði, vaksandi inntøku og lægri vøkstur av útreiðslum. Hetta hóast takstirnir hava verið óbroyttir øll hesi 3 árini, í 1986, 1987 og 1988. Útbygging, sum er í gerð og er og verður framd í 1988, er Klaksvíkarstøðin, hon er økt við 1000 telefonnumrum upp í 3000 numrum. Um 20. oktober í ár verður nýggj stød við 3000 numrum sett til í Runavík, og tann gamla tikin úr nýtslu. Hetta tiltak verður at bøta munandi um alla telefonskipanina í Eysturoynni Í Suðuroynni er Sumba og Hvalba digitaliserað og í september verður Tvøroyri digitalisera, seinni í ár kemur Vág upp í hesa skipan.

Eitt stórt framstig á leiðini er uppsetingin av Nordisk mobiltelefon sum virkandi partur av NMT skipaníni í hinum norðanlondum, hon er komin væl áleiðis, hon fær 4000 felagar, og er uppsett á telegrafstøðini og 1. januar í 1989 verður hon longu tikin í nýtslu.

Nýggj 200 kilowatt millumbylgjustøðin í Akrabyrgi er nú í gerð, hon er seinka nakað, men hon verður so liðug næsta summar, og hetta er eisini eitt gamalt ynski serliga hjá sjómonnum, sum nú er vorðið veruleiki. Drúgvar samráðingar hava sum kunnugt verið í millum P & T, telefonverkið Store nordiske og landsstýrið um yvirtøku av telegrafstøðini. Sjálv yvirtøkan fór fram 1. august og frá sama degi var telegrafstøðin ein partur av bygnaðinum hjá telefonverkinum. Harra formaður. Tað eru framdar nógvar, onkur vil kanska siga ov nógvar útbyggingar á samferðsluøkinum. kanska ongantíð áður sum í hesi samgonguni, men eg fari at loyva mær at nevna nakrar av hesum útbyggingum í hvørjum einstøkum valdømi. Tí verri verða ikki stundir til at koma inn á fleiri enn tær sum her verða nevndir. Tá ið henda samgonga tók við í januar 1985 setti vit okkum fyri at upparbeiða skálafjarðasiglingina aftur, ein og hvør Eysturoyingur mintist til, hvat støði henda farleið var komin niður á, tá stundum "Pride" stundum"Ritan, "Dagstjørnan" ja enntá"Thorshavn" vórðu sett at røkja skálafjarðasiglingina. Tað fyrst stigið á leiðini var

sum kunnugt, at vit góvu boð um, at "Tróndur" ikki skuldi takast úr hesi sigling aftur. Tað næsta stigi á leiðini var, at"Dúgvan" varð keypt umframt, at túratalið varð økt. Tað triðja stigið var, at bussrutusamband vaðr sett á stovn í Suðureysturoy og tað fjórða var, at Leirvíkartunnilin varð tikin í nýtslu, tað fimta var, at ferjulegan í Leirvík varð tikin í nýtslu, tað sætta var at pakkhúsbygningur varð bygdur á Toftum við skrivstovum, bíðirúmi, kiosk og cafeteria. Tað sjeynda, fejulega á Strondum. Í løtuni verður arbeitt við pakkhúsbygningum á Strondum við øllum nýmótans facílitetum, og í løtuni verður eisini arbeitt fyri at fáa nýggja ferjulegur bygda á Toftum. Tá ið hesi arbeiði eru framd, kann vissuliga sigast, at skálafjarðarsiglingin er á tí støði, sum allir eysturoyingar ynskja hana at vera á.

Eitt stórt framstig var tað sjálvsagt, tá ið Funningsvegurin varð tikin í nýtslu, og annars verður arbeitt við at fáa ljós í Eysturoyartunnilin.

Í Norðuroyggjum er tað soleiðis, at har skal brúgv gerast um Haraldssund og sundið skal opnast aftur fyri sigling. Soylurnar til brúnna um sundið skulu bjóðast út og arbeiðið skal byrja so skjótt, sum yvirhøvur gjørligt. Byrgingin er eisini ein partur, sum framdur er í hesum valskeiði, og somuleiðis eisini Kunoyartunnilin sum nú er komin rættiliga væl áleiðis. Tað er nærum komið á mál við Múlavegnum og sum í veruleikanum byrjaði, tá ið Norðoya tingmaðurin Asbjørn Joensen setti uppskot um ta fyrstu játtanina fram um hesa viðgerð í 1975. Í løtuni fer fram ein breiðking av tunnlinum har norðuri og tunnlin á Trøllanesi er eisini skotin í gjøgnum í hesum skeiðnum. Beileiðis sjósambandi, sum er eit tað største framstig á samferðsluøkinum har norðuri, er upp aftur tikið við Teistanum til Havnar. Og túratalið við Ternuni og Teistanum er munandi økt í mun til tað, tað var fyri nøkrum fáum árum síðani. Í løtini er so uppskot um ferjulegu í Syðradali til viðgerðar. Týðandi útbyggingar eru longu farnar fram í Vágunum og aðrar eru ávegis, vit kunnu nevna Mykinesbátin, vit kunnu nevna farmahøll og skrivstovu hjá Strandferðsluni á flogvøllinum. nýggjur hangarur verður bygdur til fastveingjaflogfør og tyrlu, umsitingin hjá Atlantic Airways hevur fastan búðstað í Vágum eins og tey mongu starvsfólkini hjá felagnum hava

búsett seg har.

Statens luftfartsvæsen skal útbyggja flogvøllin fyri einar 60 mió.kr. hesa ætlan hevur landsstýrið til viðgerðar, og eg kann upplýsa Svend Age Ellefsen, at henda ætlan hevur ikki forligið seg í landsstýrinum, hon er komin bert stutt fyri ólavsøku og hon verður avgreidd nú ein av allar fyrstu døgunum. Og tað gleðir meg at kunna siga, at undirsjóartunnilin um Vestmannasund er byrjaður og somuleiðis kunnu vit eisini taka spurningin um "Sam", tað túratalið við" Sam" er munandi økt og nú í løtuni verður arbeitt við at fáa gongd á Gásadalstunnilin. Vit skulu sjálvsagt helður ikki gloyma bussrutusambandið, sum eisini byrjaði fyri ikki so langari tíð síðani. Eg kann ikki lata verða við at nevna og tað harmar meg almikið, at eitt av fólkaflokumboðunum nú hevur lagt uppskot inn á ting um at steðga virkeminum á flogvøllinum og harumframt eisini Vágatunnlinum. Hetta er eftir mínum tykki heilt burturvið og eigur at fáa tað lagnu, tað hevur uppiborið, og tað er at falla við eitt brak. Hetta er ein so stór og grov provikatión í móti einum av okkara oyggjasamfeløgum, at Vágafólk áttu at hugsa seg nógv um, hvar krossurin skal setast til næsta val, fyri mær er eingin ivi, men hesar spurningar fáa vit høvi til at viðgera seinni.

Tað vóru nógv sum iptu øksl og flentu háandi, tá ið eg boðaði frá, at nú skuldi øll samferðsluviðurskiftini til og frá Sandoynni setast í fokus og at arbeiðast skuldi við heildarloysn og at trýggjar høvuðsætlanir skuldu fremjast undir einum, og tað vóru ferjulegu-spurningurin á Streymoyarlandinum, nýtt strandferðsluskip til Sandoyarsiglingina og dýping av pollinum í Skopun. Dýpingin av pollinum er komin væl áleiðis og fundur er í dag um strandferðsluskipið, har kostnaðarætlan og tíðarætlan verða til viðgerðar. Sum kunnugt hevur løgtingið samtykt byggingina og arbeiðið uppá ferjulegurna á Streymoyar landinum at byrja ein av allar fyrstu døgunum.

Í Suðuroy er so hent, at ferðaætlanin við strandfaraskipinum er økt munandi og umframt hetta flýgur tyrlan fleirí túrar. Arbeiðið uppá Sumbiartunnilin gongur væl og havnin á Drelnesi er tikin í nýtslu og partar av frímerkjadeildini eru eisini fluttir suðureftir.
Samferðslumálini eru annars væl lýst í fylgiskjølunum frá landsverkfrøðinginum, so eg fái ikki stundir at nevna fleiri spurningar í hesum umfarinum

Í vár samtykti annars løgtingið

eina nýggja havnaætlan og frammanundan henni hevur so tingið eisini samtykt aðrar havnaætlanir í hesum valskeiðnum eru játtaðar millum 600 og 625 mió.kr.til havnir. Har hava Norðoyggjar fingið uml. 50, Eysturoyggin 218, Suðurstreymoy 73 ella 75 mió.kr. Norðurstreymoy 95, Vágarnar 50, Suðuroyggin 93 og Sandoyggin 93 tilsamans, talið liggur, eg kann ikki siga tað við vissu í dag tað liggur eitt stað ímillum 600 og 625 mió.kr. Men hartil er at siga, at játtanir til lendingar og vegir eru ikki uppi í hesum tølunum, tað vil siga, at tær játtanir, sum eru til tær smáu kommununar ella lendingarnar, eru ikki við og t.d. sum kunnugt, so hava Norðoyggjar nógvar smáar bygdir, og har er talið av góðum orsøkum ikki so stórt, sum eg her júst havi sagt frá.

Nýggjur landsverkfrøðingur skal nú setast og samstundis verður ein reglugerð sett í gildi fyri stovninum. Oyggjadeildirnar, sum landsstýrið áður hevur boðað frá, verða eisini tá formliga settar í gildi, og verður tá ein oyggjadeild í hvørjari oyggj, ein í Norðoyggjum, Eysturoynni, Vágum, Norðstreym, á Sandi og í Suðuroynni.

Sum kunnugt og eisini fráboðað í løgmansrøðuni, so hevur landsstýrið sett ein fyrireikingarbólk til at fyrireika bygging av høvuðsposthúsi í Havn. Nevndin hevur fingið til uppgávu at lata landsstýrinum tilmæli í hesum máli, kostnað, húsrúmd og annað og hetta verður gjørt eisini tí, at hølisumstøðurnar her á posthúsinum í Havn eru heilt út av lagi vánaligar. Posthúsbyggingin í Saltangará er byrja, útgrevsturin er um at verða liðugur og fyrsta dagin verður støða tikin til útbjóðingartilfarið. Posthús skal eisini byggjast á Tvøroyri, og henda bygging er ein sambygging við aðrar, eitt nú til dømis Føroya banka. Eisini verður arbeitt við eini ætlan um bygging av posthúsi í Sørvági, kostnaðarætlan og skitsuprojekt verða í løtuni útarbeitt.

Harra formaður. Tað hava nógvar gitingar verið um, hvussu ein komandi samgonga kemur at síggja út. Menn vilja verða við, at onkur av flokkunum er byrjaður at fríggja, men at enn vóru eingi støkilig úrslit at hóma, men kortini var semja um at møguleikarnir vóru fleiri. Onkur helt fyri við meg í gjár, at tað var torført at ímynda sær eina komandi samgongu sjálvandi var eg noyddur at spyrja, hvussu tá? Jú, hann var sannførdur um, at tingbólkur Sjálvstýrisfloksins fór at kom

upp á 4 tinglimir aftan á komandi løgtingsval, og so sigur hann, jú, ein kom úr Norðoyggjum ein kom úr Eysturoynni og ein úr Suðurstreymoy og at hin fjórði bleiv eykavaldur tingmaður og at hann annaðhvørt fór at koma úr Vágum, Suðuroynni, Sandoynni ella Norðurstreymoy sum eykavaldur. Eg mátti sjálvsagt geva hesum manni rætt, at tá opnaðust heilt aðrir møguleikar Hóast alt kunnu vit konstatera,aði Sjálvstýrisflokkinum ikki nógvar atkvøður í fyri, at hetta kundi gerast møguleiki.

Harra formaður. Tað kundi verið áhugavert at hildi fram við gitingum og eisini við umrøðuni av samferðslumálum, men tíðin loyvir tí ikki.

Í næsta umfari er ætlanin at tríva í mentamálini, ið sum kunnugt ikki eru minni áhugaverd enn samferðslumálini.

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður.

Ja eg nevndi nøkur ógvuliga stór tøl, nakrar ógvuliga stórar hækkingar á figgjarlógina. Her var eitt grein 13 samferðslumál, hatta er also ein rættiliga stór øking, og har er stórur aktivitetur, og tað ljóðar ikki gott, tí tað, sum hevði størsta vøkstur á figgjarlógini, nevnliga mentamál, tað kemur fram um eina løtu, og har mugu avgjørt verða risa stórar broytingar, tí mentamál frá 1984-1988 eru hækkað við heilum 125%, so landsstýrismaðurin hevur nokk havt nakað av pengum at rutta við á tí økinum.

Tað, sum fekk meg at taka orðið var, at hann boðaði frá, at nú fór fram breiðking av bergholunum í Norðoyggjum. Álvaratos, harra landsstýrismaður, eg havi sett fyrispurning her á tingi og eg havi havt uppskot um, hvussu man kann loysa trupulleikarnar í Norðoyaberholinum, tað hevur verið feiðað av borðinum. Nú hevur man gjørt eina roynd upp á at broyta ella at víðka nøkur víkiplàss í tí norðara bergholinum, og eg vil fegin bjóða tingmonnunum norður at royna at koyra í hesum bergholi, tað er simpelthen lívsfarligt at fara í gjøgnum har. Har er alt takið skrætt niður frá, har eru stórir hyljar inni i, áðrenn tú veist av, so køvdnar bilurin í einum hyli, og har stendur tú, smekkfult av gassi og tá teir arbeiddu, tá sprongdu teir líka til kl.7 og har var tjúkt inni av sprongigassi, so har var ikki tespiligt at koma, og so kom ein rúgva av útlendingum sjálvandi mitt í summarferiu, so illa var tað teima.

Míni ráð, harra

landsstýrismaður skulu verða, gev uppat við hasum arbeiðinum, hampa okkum holið sum frægast aftur, set tað uppskotnu ljósreguleringina, sum eg havi víst á í uppskoti her á tingi, í verk, so er trupulleikin við víkiskylduni loystur og fær í gongd og prosjektera nýggj berghol eystur um fjall, tað er einasta loysn, alt annað er tvætl, alt annað er ómøguligt at gjøgnumføra. Hvussu tú so prioriterar tað inn, tað vilja so fíggjarviðurskiftini í framtíðini koma at vísa. Men "ærligt talt" vit eru stórir eftirbátar av tí, at hasi bergholini eru ótíðarhóskandi, har eru teir allar flestu bussarnir í landinum hava ikki møguleika at koyra ígjøgnum, tí tey eru ov lág, og stórir lastbilar og trailarar hava engan kjans at koma ígjøgnum. Skal man nú til at víðka tey tá tað hevur verið sovorðið órógv bara at víðka nøkur víkipláss, so dugi eg at síggja, at ferðslan eystur um fjall verður avbrotin tey næstu 3 árini, og tað gongur ikki fyri hatta økið, sum nú hevur havt berghol í 20 ár, slett aldeilis ikki harra landsstýrismaður. Tí eru míni ráð, fá hatta aftur í frægasta stand sum skjótast, tað skal helst verða í morgin at farið verður í gongd við tað. Set ljósreguleringina uppaftur soleiðis, at tann trafikkur, sum ikki klárar at halda sína víkiskyldu fær eina ljósregulering. Eg havi víst landsstýrismanninum uppi á loftinum í gjár, hvussu tað skal gerast, so eg rokni við, at hann lurtar eftir mær. Og harundir eitt nýtt prosjekt.

Ivan Johannessen (sb.) eina viðmerking

Harra formaður,

Tað var til æraða landsstýrismannin Lassa Klein, tá ið hann var uppi her, so roknaði hann runt Føroyar, hvussu nógv hann hevði gjørt og so einaferð, tá hann andaði inn, segði hann nakað um Gásadal.

Nú er tað soleiðis, at Svend, Aage Ellefsen og eg báðir, vit hava fleiri ferðir sett spurning fram um Gásadal, og upp á seinasta spurningin fingu vit at vita, at henda bergholsgerðin skuldi byrja í vár.

Fyri líka sum at steðga hesum her eitt lítið sindur, so fari eg at spyrja um landsstýrismaðurin ikki kann koma upp her at greiða okkum frá, nær tað veruliga verður byrjað upp á hetta her Gásadals bergholið sum hann hevur fráboðað á øllum hesum valskeiðnum. Tað er nevniliga soleiðis, at tað er gjørdur ein dupultsporaður

vegur uttan um Bø. Og mitt á hesum breiða autostratvegnum, sum har liggur, har er ein brúgv og hon er gjørd soleiðis, at báðar síðurnar eru gjørdar í ordan, men so liggja nakrir kavrotnir plankar til dekk í hesi her brúgv. Og her skulu allar hesar maskinurnar, sum skulu flytast til hetta bergholið, koyra tvørturum. Tí dugi eg ikki at fyristilla mær, at nakað berghol byrjar, fyrr enn hendan brúgvin er gjørd soleiðis, at tað er koyrandi tvørtur um hana við maskinamboðunum, sum skulu bora til Gásadals.

So eg eri komin til ta niðurstøðu, nú tað nærkast so nógv móti valið, at tað hevur ongantíð verið ætlanin at fara í holt við hetta bergholið. Hetta hevur bara verið ein sjónleikur fyri at hava okkurt at vísa á, og nú hava teir flutt nakrar oljutangar ella vatntangar, sum teir skulu brúka til onkrar kanningar. Eg veit ikki, hvat tað er, sum skal kannast afturat í fjallinum móti Gásadali.
Nær byrjar tann veruliga boringin, nær kunnu vit vænta at tað byrjar, sum var fráboðað at tað skuldi byrja í vár, harra formaður? Kanska vit fáa svar frá honum.

Heini O. Heinesen (tf.)

Harra formaður.

Nú hevur man so ofta hoyrt Lassa Klein tosa um, at Haraldssund skal opnast aftur.

Nú er tað soleiðis, at eg hevði ein fyrispurning í vár sum ljóðaði soleiðis: Hvør er grundin til, at landsstýrismaðurin ikki heldur seg til tær samtyktir, sum eru gjørdar um siglingarrennu í Haraldssundi, samtyktar á landsstýrisfundi 20 mars 1986, nú skriva vit 1988. So er tað, at hann sigur, at arbeiðið skal bjóðast út. Eg dugi ikki at síggja, hví hann skal bjóða arbeiðið út at stoypa tvær soylur, sum skuldu stoypast í 1987. Tað vóru 4 mió.kr. avsettar tá, og tað standa nógvir pengar avsettir eisini í ár, og tað er einki arbeiði fari í gongd, so eg haldi ikki, hatta er í tráð við veruleikan. Tað, sum landsstýrismaðurin sigur um alt annað, er so langt við síðurnar av, sum hann hevur ført fram, so orsaka meg.

Og so var tað nýtt berghol eystur um fjall, har hevði eg eisini ein fyrispurning, og eg fekk eitt svar.

Eg spurdi, um nakað var gjørt við at projektera nýtt berghol eystur um fjall, nú man skuldi brúka so nógv grót í Norðoyggjum.

Ístaðin fyri at spreingja hesi fúlu sárini inn í náttúruna, kann man bara hyggja yvir um Haraldssund tað regnar í grótí hvønn dag yviri á hinari síðuni. So kundi man heldur t.d. sprongt eitt hol í gjøgnum fjallið, um projekt var klárt, tí tað kostar tað sama at spreingja í gjøgnum eitt fjall sum í einum broti, tað er eingin munur á tí. Takk fyri

Hergeir Nielsen (tf.) eina viðmerking

Harra formaður.

Tað var kanska av praktiskum orsøkum, at formaðurin gav mær høvi til hesa viðmerkingina, tí at Lasse Klein skal kortini upp at svara so mongum spurningum, so ætlaði eg líka sum at kom uppi. Eg havi heilt nógvar spurningar, men eg skal gera heilt stutt av, og tað skulu verða fáir.

Tað vóru ikki smávegis av fyrimunum av ábótum, ið reksaðar vóru upp inni á skálafjarðarleiðini í samband við bøttum ferðasambandi. Tað eru vit øll glað um.

Eg kundi hugsað mær at spurt nakrar heilt fáar spurningar viðvíkjandi ferðaætlanini ella farleiðini til Suðuroyar. Har sigla vit tann longsta vegin, vit skulu upp á hálvari nátt, vit verða tveittir av úti á hálvum Nólsoyarfirði og skulu ganga líka av tí uttasta molanum har niðan í býin. Hvi er Suðuroyggin tað einasta stóra plássið ið landinum, sum ikki hevur eitt beinleiðis samband í móti miðstaðarøkinum aftan á arbeiðstíð t.d. friggjadag? Er tað tí man metti, at tað var rættari at nýta tann kapasitetin, sum er tøkur, á einari farleið norðureftir, har tú framman undan hevur 70 túrar um vikuna, also um Leirvíksfjørð? Haraftrat, hví er tað rímiligt, at tú hevur bussrutusamband norður til tað norðastu bygdina, sum eitur Viðareiði kl. 23 hvørt kvøld og ikki hevur bussrutusamband suður til tað sunnastu bygdina Sumba, eisini kl. 23 úr Havnini? Hví skulu tey fólkini ganga og kóla á onkrari kai onkustaðni , og ikki sleppa til hús? Tað sigur ferðaætlanin hjá okkum. Eg havi nógvar aðrar spurningar, men eg skal ikki gera meir av.

Lasse Klein (sj.)

Harra formaður.

Tað var fyrst Anfinn Kallsberg, hann tosaði um, at tunnlarnir har norðri vóru ótíðarhóskandi, also tað er einki nýtt í tí Anfinn Kallsberg, at hesir tunnlarnir eru ótíðarhóskandi, hatta vóru nakrir av teimum fyrstu tunnlunum sum vórðu bygdir í árunum, og eg

kann upplýsa Anfinni og tað hava vit eisini frá tingsins røðarapalli gjørt áður, at tað verður arbeitt við einari endaligari loysn har norðuri, hetta eru ábøtur, sum eru mettar at verða neyðugar her og nú, men eg vil væl viðganga tað, at tað uppskotið um ljósregulering, sum Anfinn Kallsberg er komin við, er eitt sera áhugavert uppskot, og tað er eitt uppskot, sum eg havi hug at arbeiða víðari við og at tosa við landsverkfrøðingsstovnin um.

Tað var Ivan Johannesen, sum ivaðist í, ella segði, at tað hevur nokk alla tíðina verið soleiðis, at tað hevur ongantíð verði ætlanin at byrja upp á Gásadalstunnilin, og at tað áður hevur verið fráboðað, at tað skuldi byrjast í vár. Eg vil væl viðgarga at, tað er rætt, at eg havi fráboðað tað og eg má bara harmast um støðuna. Tað hava trupulleikar stungið seg upp soleiðis, sum tað oftast ger á slíkum økjum sum hesum, og eg kann vissa Ivan Johannesen og Svend Aaga Ellefsen um, at arbeitt verður við at fáa Gásadalstunnilin í gongd so skjótt, sum yvir høvur møguligt.

Heini O. Heinesen ivaðist um hetta hann tosaði um, at landsstýrið fyri langari tíð síðan í 1986, nevndi hann, hevði samtykt, at brúgv skuldi gerast um Haraldssund.

Ja men tað er púra rætt Heini O. Heinesen, hatta kenni eg alt til, hatta hevur landsstýrið eisini samtykt eftir uppskoti frá mær sjálvum, tað hava verið trupulleikar í samband við, at hetta arbeiðið skuldi setast í verk, men har skal brúgv gerast um Haraldssund og sundið skal opnast aftur fyri sigling, tað er eingin sum helst ivi um tað. Grundin til at tað ikki er smávegist, sum eg havi nevnt, í samband við tað, sum Hergeir Nielsen var inni á, í samband við Skálafjarðarsiglingina so er tað tí eisini, at har hava ábøtur verið neyðugar, tí at tað hevur helst verið soleiðis, at tað hevur verið gjørt ov lítið frammanundan.

Hví hava vit ikki beinleiðis samband aftaná arbeiðstíð við "Smyril". Ja, hatta er eisini ein spurningur sum vit skulu taka til viðgerðar og Hergeir Nielsen er heldur ikki ókunnigur við, á hvønn hátt tann viðgerðin fer fram. Eg havi heldur einki imóti, at taka spurningin um buss rutusambandið upp til viðgerðar eins og tað er til Viðareiðis aftaná kl. 23°°, tað haldi eg er bæði rimiligt og rætt, at hesir spurningar fáa ta viðgerð, sum teir eiga.

Poul Michelsen (ff.) eina viðmerking.

Harra formaður.

Ja, eg haldi, eg skal heldur ikki leggja stórvegis aftrat tí, sum aðrir hava sagt frammanundan, men undanfarni røðari landsstýrismaðurin Lasse Klein hevur væl prógvað væl og rímiliga, hví at tað stendur so til í samfelagnum, sum tað nú einaferð ger.

Eg haldi eisini, tá ið vit hava hoyrt Hans J. Debes, Karin Kjølbro og Jóngerð Purkhús, so haldi eg, tey skulu rætta sínar talur í mótir sær sjálvum, tí meginparturin liggur væl goymdar í tí ómetaliga virksemi, sum er sett í gongd og sumt er framt og sumt er við at fara í stcypiskeiðina. Men so nevndi Lasse Klein nakað um, at tað mundi vera stór provokatión, ið eg hevði gjørt við at leggja uppskotið fram um at steðga undirsjóvartunnilinum og útbygging í Vágunum. Tað kann so væl verða, nú havi eg tað fatan, at vágafólk eisini eru skilafólk og gott vilja verða við í hesum samfelagnum og eg haldi, at eingin er sinnaður at galda einar 500-600 mió.kr. fyri at vinna ein kandidat úr Vágunum, tað fái eg meg ikki til at góðtaka. Eg haldi eisini at Lasse Klein skal rokna við at taðn, sum hann nú segði, var ein rættiliga stór provokatión í móti tí føroyska samfelagnu tí júst í uppskotinum stendur hjá mær, at tað var talan, um at vit brúka eitt stað í millum 50 og 100 mió.kr. frá tí føroyska samfelagnum. Tann føroyski skattaborgarin, brúkarin skal rinda, í dag rindar brúkarin millum 1000 og 1200 kr. ov nógv fyri hvønn ferðaseðil orsakað av ti skilaloysi, ið m.a. Lasse Klein hevur staðið fyri, so eg haldi, at tað eru allar grundir fyri at rokna við, at tað uppskotið, sum eg havi lagt fram her fær sakliga viðgerð.
Takk fyri

Svend Aage Ellefsen (ff.) viðmerking.

Ja, harra formaður.

Eg skal takka Lassa Klein fyri tað svarið, sum hann gav mær viðvíkjandi Gásadalsbergholinum. Eg má siga, at eg trúgvi Lassa Klein, tá ið hann sigur, at hann hevur roynt at arbeiða við hesum málinum. Eg haldi, Lasse Klein hevur roynt at arbeitt við hesum málinum um Gásadalsbergholið, eins og eg veit, at hann hevur arbeitt fyri tí fasta sambandinum um Vestmannasund,

sum hann segði nú er byrjað, ið hvussu so er í smáum, men ið hvussu so er byrjað.

Eg veit, at hann hevur havt ávísar kreftir innan fyri sína egnu samgongu ímóti sær. Vit minnast jú ta skivingina, sum var frá teimum størru samgonguflokkunum í mótur fasta sambandinum. Vit minnast tann ágangin, sum hann og Tordur Niclasen vóru fyri, tá teir skuldu bjóða Ivan Johannesen og mær yvir at hyggja eftir undirsjóvartunnlinum yviri í Alesund, so eg veit, hann hevur ikki havt tað lætt, eg vil takka honum fyri hansara lut í hesum her, at vit eru komin hartil, at vit nú fáa tað fasta sambandið. Eg eri samdur við honum, tá ið hann sigur, at tað er ein grov provokatión ímóti hesum høga tingi, tá ið borgmeistarin í Havn, sum jú eisini er limur av Føroya løgtingi leggur fram eitt uppskot um at steðga hesum arbeiðnum tvørtur um Vestrannasund, sum eitt samt løgting hevur samtykt bert fyri umleið trimum mánaðum síðani. Tað er eftir mínum tykki rætt, tá ið hann heldur, tað er ein grov provokatión. Eg skal vissa landsstýrismannin um, at tað uppskotið hjá borgarstjáoranum í Havn er rætt, hann er eisini limur í tingbólki Fólkafloksins, men tað uppskotið kemur ikki at fáa stuðul frá Fólkaflokkinum, annars hevði tað verið Fólkaflokkurin sum legði tað fram, tað er greitt.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking.

Harra formaður.

Til Lassa Klein, landsstýrismann í samferðslumálum. Tá hann nú sigur, at sambandið, byrgingin ella siglingarrenna í Haraldssundi skal gerast eftir uppskoti frá honum sjálvum, so trúgvi eg væl, at arbeiðið ikki er farið í gongd. Eg haldi hatta er langt úti, og so hevur hann eisini skuldsett meg fyri at hava stolið tilfar frá honum, í onkrum fyrispurningi, so rokni við at verða líkað væl inni í hesum her málinum, sum Lasse Klein, og so tá hann tosar um samtyktirnar í Landsstýrinum, so er tað soleiðis at tað eru seks fólk í Landsstýrium, sum hvør flokkur kann hava sína ávirkan á, Tjóðveldisflokkurin eigur tvey av teimum fólkunum. So er tað ein viðmerking til Svend Aage Ellefsen. Hann sigur, hann trýr Lassa Klein og so eru tað ávísar kreftir, sum hava verið í móti tí fasta sambandinum. Men eg trúgvi næstan tí, at í øllum hesum rokanum, sum

nú hevur verið útgjaraður har vesturi í Vágunum er Gásadals-tunnilin farin aftur í gloymi-bókina, og tað trúgvi eg verður mest skyldað teimum, sum vilja gjarða út har vesturi, og har stendur Svend Aage Ellefsen á odda. Tí um undirsjóvartunnilin vestur til Vágar bíðaði eitt ½ ár ella so, so var hetta heilt skilagott. Eftir sum tunnils-greiðirnar koyra í dag, so vildi tunnilin til Gásadals kunnað farið í gongd, men tað eru teir sjálvir, sum rumbla við málinum, og tá teir sótu har sjálvir tey fýra árini, kláraðu teir ikki eitt einasta eitt petti, og tá henda sam-gongan leggur frá sær, so trúgvi eg, at øll maskindeild-in hjá landsverkfrøðinginum stendur vesturi í Vágum, bæði tunnilgreiðir og alt, tær sum ikki standa á Vágoynni, tær standa hinumegin við, so eg haldi teir nýtast als ikki at standa her og høgga í.

Formaðurin heitir á tingmenn um at stytta viðmerkingarnir eitt sindur.

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerk-ing.

Harra formaður.

Eg fari fyrst og fremst at takka Lassa Klein fyri,at hann vil takað hatta uppskotið hjá mær til sín og arbeiðja víðari við tí. Eg eri bara keddur a● at hann ikki hevur gjørt tað fyrr, tí tað er meira enn 1½ ár síðani, eg setti tað fram, men sum hann sigur, betri seint enn ongantíð, og kann hann fáa hasa loysnina, so trúgvi eg, at vit eru ið hvussu so er betri fyri, enn vit eru í dag.

Í Haraldssundi var tað so-leiðis, tá henda samgongan tók við, at har var eitt ávíst arbeiði byrjað, men so verður tað lagt stilt, og tað varð sagt, at nú skuldi Haraldssund hava innihald og nú skuldi ein loysn finnast. Tað tók eitt ár, so kom loysnin, jú, tað skuldi fyllast í ein boða uttanum, og so skuldi nýggj brúgv gerast, og landsstýrismaðurin sigur, at súlurnar tær skulu bjóðast út sum skjótast. Nú eru trý ár síðani tað varð tipt í Haralds-sundi og enn er einki boðið út. So skjótt gongur tað ikki, og● gongur tað ikki skjótari enn tað hevur gjørt, so verður einki avrikað í Haraldssundi í hesum valskeiðrum. Men tað, sum fekk meg at taka orðið aftur, er, at eg nú um dagarnar hoyrdi, at tað var komin ein "park" av maskinum til asfalt-ering av byrgingini um Haralds-sund at standa har norðuri, og nú skuldi asfaltterast. Tað týðir●

ið hvussu so er í mini verð, at har ættar landsstýrið ið hvussu so er ikki at gera nakað sum helst. So nú vil eg fegin spyrja landsstýrismannin, var tað veruliga soleiðis, at tað skuldi asfalterast bæði væl og virðiliga soleiðis, at einki meir skuldi henda ella hvussu?

Hergeir Nielsen (tf.) viðmerking.

Harra formaður.

At døma eftir teimum mongu viðmerkingunum og fyrispurningunum frá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum, so er eitt týðuligt prógv um, at teir hava fult álit á búskaparstyrkini í hesum samfelagnum undir hesari samgongini nú, teir eru altráir eftir at fáa ymisk almenn arbeiði avrikað. Fyri 4 árum síðani ella tey 4 árini, tá teir sótu í samgongu orkaðu teir 5 mió.kr. um árið til alt hetta her. Vit takka fyri tað álitið.

Til Lassa Klein skal eg bara siga stutt, at tað nyttar ikki, at hann í dag, nú ið hann ongantíð fær møguleikan aftur, er positivur fyri at bøta um tey viðurskifti á Suðuroyarsiglingini, sum eg nevndi. Tað nyttar so ógvuliga lítið, tá hann hevur verið negativur og ikki hevur viljað reagera upp á tað í 4 ár.

Lasse Klein (sj.) viðmerking

Harra formaður.

Nú kann eg svara aftur upp á tað seinasta, og har kann eg bara upplýsa, at tað eru ongantíð farnar fram so stórar broytingar viðvíkjandi Suðuroyarsiglingini sum undir hesi samgonguni, tað er als ongin ivi um tað bæði viðvíkjandi tí beinleiðis sjósambandinum og so er eisini fleiri túrar við sjálvari tyrluni.

Poul Michelsen tosaði, um hesar íløgurnar, um hesar villu íløgurnar, sum eru framdar í hesum valskeiðnum, og eg eisini var inni á tí, men eg kann upplýsa Poul Michelsen, at hesar íløgurnar, sum eru gjørdar, eru gjørdar innanfyri karmarnar av tí, sum okkara samfelag tolir, og eg kann eisini upplýsa Poul Michelsen um, at eg havi eina samda samgongu aftan fyri meg í hesum spurningum. Um Poul Michelsen kallar tað fyri eina grova provokatión, at vit nú hava stovnað okkara egna flogfelag, sum eitur Atlantic Airways, ella tað at vera eina grova provokatión, at vit nú hava yvirtikið okkara egnu tyrlutænastu, ella vit fyri heilt stuttum yvirtóku t.d telegrafstøðina,

ja, so fari eg at ivast í, hvar Poul Michelsen stendur í føroyskum politikki, tí tað kann væl ongantíð verða nøkur grov provikatión.

Heini O. Heinesen segði, at eg skuldi hava skuldsett hann fyri at hava stolið tilfar frá mær. Nei Heini, soleiðis kann eg ikki hava málborið meg, men tað kann gott vera, at eg havi sagt, at tilfarið hevur líkst onkrum av tí, sum eg havi skrivað. Men soleiðis trúgvi eg ikki, at eg havi málborið meg.

Í samband við tað, sum Arnfinn Kallsberg var inni á í samband við asfaltering og aller hasar maskinurnar, sum nú eru fluttar til Haraldssunds. Hatta kenni eg ikki rættiliga nógv til og tí ikki førur fyri at svara hasum spurninginum júst nú.

Sverre Midjord (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tað hevur mangan verið sagt, at Javnaðarflokkurin gongur í fleiri pørtum. Tað er væl eisini so, av og á ger hann tað, men so spjaddur sum Fólkaflokkurin hevur hann tó ongantíð verið. Og vit hava verið varir við, at viðhvørt kenur Svend Aage við einum uppskoti, so eigur Svend Aage tað og ikki Fólkaflokkurin. Nú var Svend Aage uppi her og segði, at uppskotið hjá Poul Michelsen var hansara uppskot. Tað var ikki Fólkafloksins uppskot. Samstundis upplýsir Poul Michelsen, at tað var alt ov dýrt at ofra 400 mió.kr. fyri at varðveita ein tingmann vesturi í Vágum. Væl veit eg tað, at teir borgarligu eru dýrir, men at teir vóru so dýrir, tað hevði eg ongantíð roknað við.

Ivan Johannesen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var bara ein viðmerking til Poul Michelsen. Nú kundi eg kanska bíðað við tí, tí vit fáa málið um at steðga undirsjóvartunnlinum til viðgerðar um nakrar dagar. Men hann byrjaði við at siga, at tað var fyri at vinna ein tingmann í Vágum. Also í veruleikanum er tað soleiðis, at eftir skipanini so eiga vit tveir tingmenn í Vágum. Vágoyggin eigur tveir umboðsmenn, so har er eingin at vinna. Tað eru tveir, og í ringasta tilfeldi, sum eg neyvan rokni við, so kunnu vit fáa ein aftrat, men tað hendur sjáldan.

So kemur hann við einum pástandi um, at tað eru 1000-1200 kr. dýrari, tí flogvøllurin liggur í Vágum. Eg havi ikki hugt í ferðaætlanina, men mær vitandi kostar tað 70 kr. fyri ferðaseðil úr Havn vestur á flogvøllin.

So at Poul Michelsen skal fáa tað til 1000-1200 kr. tað skylji eg ikki. Hann tosar Einki um allar teir pengarnar, sum bygdafólk gjalda fyri at koma inn á hesar stovnarnar, sum eru lagdir í Havn, og hvar vit missa, so segði hann, bæði dagar og nætur og mugu gista her í Havn fyri at gera smáerindir, tað tosa havnarmenn einki um. Eg haldi tað verða ótrúligt av borgarstjóranum í Havn og løgtingsmanninum Poul Michelsen at royna at forða øllum, sum skal byggjast úti um landið, bara tað ikki er í Havn, so skal tað steðgast.

Eg havi hugsað um havna-byggingina, sum fer fram her í Havn. Eg veit ikki um tit hava gjørt tykkum tann ómak at fara út har og hyggja, hvat tað er, sum fer fram. Í mínari verð er tað størsti ørskapur sum fer fram viðvíkjandi útbygging í Føroyum, tað er tað sum fer fram her í Havnini. Ti ein kann spyrja, hvat er tað sum fer fram. Tað sum fer fram, tað er tað, at teir føra grót av Glyvursnesi og yvir til Havnar fyri at uppfylla Nólsoyarfjørð til at seta nakrar kontainarar á. Also í staðin fyri at fari inn á Kollafjørð ella Kalbaks-fjørð og fingið eitt øki til at seta kontainarar á. Men hvat, tað er tað sama tað skal verða í Havn, also tað skal ikki verða nakra aðrastaðni í Føroyum. Vit byggja eina stór tunnil til Kollafjarðar, hvat skuldi verið í vegin fyri at sett kontainararnar har inni í staðin fyri at ofra 100 tals mió.kr. til at føra grót av Glyvursnesi og leggja tað uttan fyri molan í Havn fyri at seta kontainarar á. Eg haldi, at landsstýrið skuldi langt síðan havt tikið og steðgað hasum projektinum.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Harra formaður.

Eg má siga tað, at hevði Poul Michelsen ikki verið mín egni floksfelagi, so haldi eg, at eg hevði sagt, at hatta var væl sagt Ivan Johannesen. Hatta var talað sum úr mínum egna munni.

Men tað var Heini O. Heinesen, sum var her uppi og líka sum vildi leggja hetta við undirsjóvartunnlinum, sum hann kallaði fyri útgjarðing, og tá serliga frá mínari síðu, og tað er upp á bekostning av Gása-dalsbergholinum. Tað er ikki rætt formaðurin, ti tað, sum vit hava gjørt viðvíkjandi undirsjóvartunnlinum, tað er, at vit alla tíðina dyggiliga hava tikið undir við, at undirsjóvartunnilin

er ein íløga, sum skal gjalda seg sjálva aftur, tískil ikki tyngja m.a. landskassan. Í samband við tað, sum vit ætla ella ætlaðu langt síðani skuldi verða gjørt, nevnliga vega-sambandið til Gásadal, sum er tann einasta bygdin í hesum landinum, sum einki vegasamband hevur enn tann dag í dag. Eg fari at heita á landsstýris-mannin um at svara uppá, nær ið vit kunnu rokna við at tað verður farið undir hetta.

Landsstýrismaðurin var her uppi og fanst at Poul Michelsen fyri tað uppskotið, sum hann hevði sett fram, og tað tók eg undir við, men tá hann sigur, at Poul Michelsen heldur tað verða provokatión, at vit hava fingið Atlantic Airways upp at flúgva, so trúgvi eg ikki, at tað er soleiðis, eg trúgvi heldur, at tað er hinvegin, tann vegin, sum Ivan Johannesen var inni á nevnliga, at vit hava fingið eitt egið føroyskt flogfelag. Tað er gott í sær sjálvum, men tað, sum er galið er, at arbeiðsplássini í sam-band við hetta flogfelagið og tað, sum annars hevur við flog-felagið at gera, liggja vesturi í Vágum, og tað er harmiligt, at Poul Michelsen skal hava hasa støðuna, men hetta er jú ein støða, sum hann sjálvur kunngjørdi í útvarpinum fyri nøkrum vikum síðani, so tað man væl sagtans verð rætt, tá tað verður sagt.

Poul Michelsen (ff.)stutta við-merking

Harra formaður.

Nú kom líka sum øði í tað heila og tað kann man nokk skylja. Málið er ógvuliga týdningarmikið og eg haldi eisini, at umfarið hjá Lassa Klein líka sum hevði tað í sær sjálvum, at tað er ein provoka-tión og har er tað líka sum lokaløkini koma við, og tí má tað verða sum tað er.

Tað fyrsta sum eg fegin vil siga er, at eg haldi, at tað er rímiligt, at eg fái heiti sum tinglimur her eins og allir aðrir. At eg so havi eitt annað starv, tað er ein onnur síða av málinum, men kanska grundgevur tað betur nakað annað fyri tað neyðuga ið at verða her. Men eg kann í hvussu so er siga við Lassa Klein fyrst og fremst, eg kalli tað villar íløgur, og eg meti tað framvegis, at tað er við einum lækkandi inntøku-grundarlagi hjá fiskivinnuni okkra, tað er alt, sum berdur á tað og tað er jú tað, sum spáða verður. At man so stendur framan fyri íløgum sum vit hava fingið nevnt í fleiri umførum fyri einar 2-3 mia.kr., tað má verða skilaleyst og tað

og tað er skilaleyst og tá man ikki gevur sær stundir til at umhugsa at man skal brúka 500-600 mió.kr. vesturi í Vágunum. Tá man er liðugur við hetta, so eru tær íløgurnar farnar til onga nyttu og har til skal eg siga tað til mín egna floksfelaga, at tað er líka sum undir beltstaðið, at tað ikki ber til at tosa um flogvallarmálið uttan, tað skal sipast til at man ætlar at taka grundarlagið undan vágafólki, tí tað er ikki so, tað hevur verið roynt í fleiri umførum at gera tað til tað, men soleiðis er ikki.

Tað snýr seg um at fáa flogvallarspurningin mettan av nýggjum og tað skal hann verða, eins og so vissur, ið Lasse Klein er í, at Haraldssund skal latast upp, so skal flogvallarmálið koma til umrøðu líka so leingi, sum eg siti í tinginum, verið vis í tí. Tí tað er flogvallarmálið, sum eg fegin vil sleppa at tosa um, og tað sama haldi eg, at Ivan Johannesen skuldi gjørt sær far um, tí eg havi eirki í móti og eg ásanni, at tað er rætt, at man hevur brúkt høvuðsstaðin og er hetta her eitt sentralt øki, sum øll Føroya fólk kunna gera tænastu av og at man ger eitt samferðslulið, sum kann gera nýtslu av tí. Eg var eisini fyri principielt at byggja undirsjóvartunnil, so man kann koma lættliga til Havnar at avgreiða sini ørindir, og tað taki eg principielt undur við, um man kann fáa eina íløguætlan, sum ber seg, men eg eri ikki við upp á, og tað er tað sum eg skrivi í álitinum hjá mær at brúka 600 mió.kr. til ein nýggjan undirsjóvartunnil og útbyggjan í Vágum fyri einari loysn tí tað eru aðrir, sum hava vent tað, til, at undirsjóvartunnil er ein partur av flogvallarmálinum, ikki eg, og tá kann eg siga til mín floksfelaga Svend Aage Ellefsen, at eg havi fingið eitt lyfti frá Fólkaflokkinum tá ið tað gekk út upp á at taka undir við, at flokkurin tók undir við undursjóvartunnlinum, at tað ikki skuldi verða ein partur av flogvallarmálinum. So veit eg ikki, um Fólkaflokkurin hevur broytt meining síðani tá. Grundin til at eg reisi málið av nýggjum er tann, at Fólkaflokkurin segði seg verða fyri, at undirsjóvartunnilin var eitt samferðslulið og ikki ein partur av flogvallarmálinum. Fyri tað næsta so haldi eg eisini, at Svend Aage Ellefsen hevur eini 3 til 4 uppskot um flogvøllin, sum Fólkaflokkurin heldur ikki hevur tikið undur við, har millum annað í at steðga Tórshavnar kommunu í at gera kanningar á Glyvursnesi. Tað var ikki Fólkaflokkurin

sum stóð aftan fyri tað uppskotið so hetta uppskotið skal eg fegin standa einsamallur fyri, men eg havi heldur ikki kravt nakran fólkafloksmann at taka undur við tí, men eg billi mær inn, at Fólkaflokkurin fer ikki at verða so burtur við til eitt komandi val ikki at standa framan fyri og ásanna at íløgurnar eru avmarkaðar, og tá má verða talan um at hugsa seg væl um.

Til Lassa Klein at enda. Eg havi einki í móti Atlantic Airways, eg havi stuðla, tí og eg meini eisini føroyingar taka val undir við tí, men um Atlantic Airways ikki hevur aðra missión enn at vera føroykst, so er ongin meining í tí. Roynið tit at sláa tykkum saman við Maerk Air og gerið nakrar avtalur og fáið framvegis brúkarar at halda seg uttanfyri. Tað er ikki nokk Lasse Klein at Atlantic Airways er stovnað. Tann føroyski brúkarin skal hava nyttu av tí, tað er ikki bara tað føroyska flaggið tað er tann føroyski brúkarin, sum skal hava nyttu av tí um Atlantic Airways er stovnað uppá. Tað, at tað bara skal verða føroyskt, kemur at avmarka, at føroyingar kunnu gera nyttu av tí, tað komi eg ikki at góðtaka, tað kann eg gott siga. Takk fyri.

Lasse Klein (sj.) seinastu viðmerking í hesum umfari

Harra formaður.

Ivan Johannesen tosaði um villar íløgur her í Havn t.d. Eg haldi ikki, at vit skulu blanda slíkar spurningar saman, tí alt, sum hevur við havnaætlanir at gera, tað er og verður ein lokal politiskur spurningur, so eg haldi at tað er ikki rætt at blanda málini soleiðis saman. Svend Aage Ellefsen var inni á spurningunum um orsøkina til, at Gásadalstunnilin ikki varð farin í gongd enn, at tað var orsakað av undirsjóavrtunnlinum. Her vil eg bara afturvísa, at teir báðir spurningarnar hava nakað sum helst við hvønn annan at gera.

Poul Michelsen tekur uppaftur, og tosar um villar íløgur, sum eg nevndi í mínum innleggi. Hann sigur ikki við vissu, hvørjar íløgur talan er um, hann bara slongir út, at tær íløgurnar, talan er um eru villar íløgur.

Atlantic Airways er sjálvsagt stovnað fyri føroyska brúkaran og tað haldi eg, at teir flestu føroyingar munnu hava ásannað.

Eg fari haraftrat at endurtaka, at íløgurnar, sum eru gjørdar í samferðslumálum síðani 1985,

eru gjørdar innanfyri karmarnar av tí, sum tað føroyska samfelagi tolir og tað er gjørt innan fyri karmarnar av tí, sum okkara fíggjarlóg er før fyri at bera, og sum samtykt er.

Eg haldi ikki, tað er neyðugt í hesum umfari at koma inn á aðrar spurningar, men eg vil at enda undurstrika, at tað uppskotið, sum Poul Michelsen hevur lagt fram á ting, fáa vit høvi til at viðgera seinni. Eg eri ógvuliga spentur, og vil ógvuliga fegin luttaka í tí orðaskiftinum. Tað er eisini rætt, at tað er kanska ikki hóskandi, at hesin spurningurin verður viðgjørdur her og nú, men tá ið eitt slíkt uppskot kemur á borðið, so freistast man, íð hvussu so er at viðgera tað.

Formaðurin

Tordur Niclassen hevur orði til framløgu av tingmáli nr. 9: Afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla.

Tordur Niclassen (kff.)

Harra formaður,

Í september 1985 samtykti Føroya landsstýri at seta í verk tænastumannakanning í móti skúlastjóranum og 13 lærarum við Vágs skúla.

Henda politiska avgerð varð tikin, hóast landsskúlaráðið ikki metti grundarlag at verða fyri slíkari kanning og hóast skúlanevndin við Vágs skúla ikki kærdi avgerð landsskúlaráðsins.

Allan Moltke Hansen, dómarafulltrúi varð útnevndur sum forhoyrsleiðari 7. oktober 1985. Avhoyringarnar av skúlastjóranum og teim 13 lærarum byrjaðu ikki fyrr enn 21. apríl 1987. Hetta orsakað av, at avvarandi myndugleiki ikki hevði fylt galdandi framferðahátti í galdandi tænastumannalóg. Teir politisku myndugleikarnir hava eisini støðugt blandað seg í og lagt trýst á forhoyrsleiðaran meðan kanningin er farin fram.

Avhoyringarnar vórðu loknar nú í vár og er sostatt komið upp undir land við umlaðaðu tænastumannakanning. Nú, beint áðrenn úrslitið av kanningini fyriliggur, tekur landsstýrið á fundi 27. juli 1988 avgerð um at suspendera ein teimum 14 í kanningin umfatar, nevnliga skúlastjóran sjálvan. Henda polittiska avgerð, sum nú er tikin, má metast bæði ósaklig og ógrundað, ikki minst tá hugsað verður um, at skúlastjórin undir nevndu truplu umstøðum hevur megnað at rikið skúlan í hesi trý árini uttan, at fingur kann setast á nakað. Av sakkunnleika verður eisini mett, at avgerð landsstýrisins beinleiðis er ólóglig, óneyðug skuldi verðið at komið í tingið við uppskoti

sum hesum, men tá hugsað verður um, hvussu leikur er farin fram í hesum máli, so verður hetta gjørt í vónini um, at meiriluti fæst her á tingi fyri at fáa í rættlag avgerð, sum frá løgfrøðisligum sjónarmiði verður søgd at verða einum rættarsamfelag óverdug.
Við formansins loyvi vil eg leggja soljóðandi uppskot til samtyktar:

Álagt verður landsstýrinum alt fyri eitt at taka aftur suspenderingina av skúlastjóranum við Vágs skúla.
Takk fyri.

Tingfundur niðurlagdur og uppaftur tikin kl. 14°°.

Tingfundir uppaftur tikin

Poul J. Olsen (jv.)

Harra. formaður.

Tá ið vit nú í 1½ dag hava viðgjørt løgmansrøðuna, so verður tað helst ikki nógv nýtt, ið eg komi at føra fram í hesum orðaskiftinum.

Hetta er tann seinasta løgmansrøðan í hesum umfari hjá hesum løgmanni, men sjálvandi koma nakrar afturat, aftan á valið.
Í røðuni verður nortið við øll mál av týdningi og av góðum grundum einum sovorðnum samandragi sum hesum her, kann ikki so ógvuliga nógv verða sagt um hvørt einstak mál.

Tá løgmaður heldur sína røðu á hvørjum ári á Ólavsøku, so meta menn um, hvussu ið hendan røðan er og tað verða altíð ymiskar meiningar um tað, og tað má soleiðis verða.
Tað, sum eg haldi verða tað besta í hesi røðuni hjá løgmanni, er endin á henni.

Setera við formansins loyvi:

Hann sigur: "Samgongan gongur óskammað fram fyri dóm veljarans í heyst." So sigur hann: "Vit tóku við búgvi, sum hóast sterkt í grundini, tað eru Føroyar, fólkatilfarið í hesum oyggjum, hevði stórar trupulleikar og lata frá okkum búgv munandi styrkt og konsolideað."

Nú er tað at siga, at tá ið hetta landsstýrið tók við, so var tað ymiskt, sum varð funnist at, tá ið tað landsstýrisskeiðið var úti og soleiðis vil tað óivað altíð verða. Tað er einki undarligt, um tað er nógv at finnast at hjá hesum eisini, tí tað er ikki alt, ið er líka gott, tað kundi mangt verið øðrísi, tað kunnu allir samgongumenn siga,

men í tí stóra og heila, so halda vit at tað hevur gingið bara væl.

So sigur løgmaður eisini: "Tað er munin hugaligari at virka fyri at loysa trupulleikar av nógvum arbeiði enn at laða upp í lið, sum komin eru í, av tí at einki var fyri hendurnar."

Nú er tað at siga, at vit hava ikki havt arbeiðsloysi og tað er bara gott, men hitt at hava ov nógv arbeiðið, tað kann eisini verða nokk so vandamikið.

Tað var ein danskur statsministari, sum í sínari tíð segði at stýra einum landi, sum hevði arbeiðsloysi, var ikki so ógvuliga torført, men at stýra einum landi, sum hevði ov nógv arbeiði, tað var straks nógv verri.

Tað kann vera nokk so vandamikið, tað er klárt, og sigur hann víðari: "Vit fara ikki til valið at gykla fólki dans á rósum, men siga hart og ærliga, at avmarkandi politikkurin, ið ríkin hevur verið seinastu trý árini, má fasthaldast í ávísan mun." Tað hevur verið roynt at avmarka, men nú hoyrdu vit landsstýrismannin í samferðslumálum Lasse Klein. Tað var ikki eiti á, hann roknaði upp, hvat hann hevði gjørt, og tað var alt útreiðslumál, sum hann tosaði um, alt tað heila alt, tað var einki inntøkumál at hóma nakrastaðni, so eg tonki við mær at tað skuldi nógv til fyri fylla alt hettar upp, sum hann segði seg at hava lagt fyri dagin í hesum valskeiði.

Man kann ikki siga, at samgongan hevur altíð havt so gott áralag í hesari tingsetuni og tað er sjón fyri søgn, tí tann eini flokkurin fór út. Hetta her at slíta samgongu og hótta við at slíta samgongu, metið eg at vera ógvuliga ómansligt. tá tað er ein samgonga við einum so teprum meiriluta, sum einum, so hava allir tingmenn møguleika at slíta eina samgongu, tí haldi eg tað verða ógvuliga ómansligt. Hetta vísir seg at vinda upp á seg, tað vísir seg, tá man hevur ein so tepran meiriluta, at fái eg ikki hettar ígjøgnum, ja so slítið eg, so seti eg tað upp á spíssarnar og ein annar eitt annað. Tí haldi eg og vildi fyrisligið eisini, at tað hevði verið nógv betri, at vit broyttu vallógina, vit gjørdu tað bara í heyst, soleiðis t.d. sum teir hava tað í Noreg, at vit valdu eitt løgting fyri fýra ár, so munnu tit finna út av, hvussu tit stýra í hesi fýra árini, tit sleppa ikki frá. Hatta, haldi eg, hevði verið

sera gott fyri demokratiið hjá okkum. hitt verður bara eitt vrøvl aftur og fram, at slíta samgongur og hótta við at slíta samgongur.

Eg vil viðganga at útbyggingin á landi hevur verið í so stór hesi árini, hetta kundi havt verið toygt yvir eitt sindur longri tíðarskeið. Tí um ein tunnil kemur eitt ár ella tvey ár seinri, tað týðir ikki so nógv, men vit vita hvussu ringt ið hetta er, júst tí at vit hava ein tepran meiriluta, og so kemur ein frá einum valdømi og sigur, um eg ikki fái hatta í gjøgnum nú, so eri eg ikki við longur. So kemur ein annar frá einum øðrum og togar hin vegin aftur. So tað er nokk so ringt at halda saman upp á samgongur handa hátt. Tí var hitt nógv betri náti, at man skuldi verðið valdur fyri 4 ár og ikki kunna slitið eina samgongu í úrtíð.

Útbygging á sjónum hevur eisini verið ógvuliga stór og sum tað hevur verið sagt nú av fleiri røðarum, so er ikki alt so væl eydnað her, av tí at tað eru fleiri skip, ja, tað eru nú eini 3 ið hvussu so er, haldi eg, eitt er fari av landinum og tvey onnur eru løgd, og tað eru tvey svartkjaftaskip, so har hevur ikki eydnast væl. Har hevur í grundini verið ein skeiv meting, kann man gott siga, men eg veit ikki, um hon er skeiv kortini, tí har er nakað av fiski, so um man helt fram við at royna hetta, so haldi eg, at man hevði fingið tað at gingið, men tað skulu pengar til. So verður tað sagt, at skipaflotin er ov stórur, her haldi eg, at tað er ikki bara hesari samgongu at skylda fyri, at skipaflotin her á grunnunum er ov stórur.

Eg veit, at í seinastu samgongu vóru komu nógv, nógv fleiri skip at fiska undir grunnunum enn tað eru komin undir hesi samgongu. Henda samgonga hevur ført tann politikk, at fyri hvørt skip, sum kemur inn skal minst eitt koyrast út, og í summum støðum fóru fleiri út fyri eitt. Nú kann tað verða og verður tað helst soleiðis, at tey nýggju skipini, sum koma inn, eru meira effektiv enn tey gomlu, sum mangan fara út. Men tey skip sum komin eru, tey eru meira til langfarafiskiskap enn tey eru ætlað til hesar grunnarnar hjá okkum.

Tað hevur eisini verið tosað um hesar her fragtbátarnar, sum komu undir seinastu samgongu, at ja, landsstýrið verður skuldsett fyri, at teir gjørdu einki fyri, at vit kundu behalda teir, men her var ikki so lætt at gera nakað, men mær tykir synd í teimum, sum koma at missa pengar, stórliga synd í

teimum, tí eg haldi at hesir menn eru nógvir av teimum førdi" bak ljósið", av ringari ráðgeving, tað er mín meining um hetta her. Tí at fara út í slíkt og hanga upp á ein stóran kapital, um tað gongur illa, sum tað ofta ger, bæði innan fyri farmaskip og innan fyri fiskiskip, tað er eitt váðaverk, og tað skuldu menn fingið at vita og teir skuldu helst fingið tað at vita frá almennari síðu, hvat risiko teir tóku. Hvørjir teir eru sum eru, rágevarar fyri hesar menn, tað veit eg ikki, men teir hava fingið eina vánaliga ráðgeving, tað kann eg siga teimum. Og tað sigi eg eisini um tað, at hesi skip kundu helst verðið bjargað, um uppskotið, sum Javnaðarflokkurin hevði innar fyri samgonguna um, at tað almenna yvirtók hesi skipini ella keypti hesi skipini aftur, og síðan um tað vísti seg at ganga, so kundi man láti tey út aftur til feløg. Men vit fingu ikki nóg góða undirtøku fyri tí uppskotinum.

Nú verður tað mest tosað um kreppur, man hoyrir bæði týðliga og seint, bæði mann og mann í millum og í bløðum og her í tinginum, tað fer maður av manni upp at tosa um, at landið er í kreppu. Hetta er helst eitt speciali fyri Fólkaflokkin, tí tað var eisini í seinasta landsstýrisskeiði, tá var tað tann táverandi fiskimálaráðharrin, sum segði, at alt landið var í kreppu, tað var, tá teir vóru við at leggja frá sær í 1984. Nú siga teir tað sama hetta landsstýri, so eg veit ikki, hvussu man skal taka tað. Nú standa teir her og siga, at tað stóð nógv betur til tá, men tá var landið í kreppu, og nú stendur tað illa til og tað er í kreppu sjálvandi. Eg skylji ikki hetta roksið og hetta gorrið um, at teir sum kenna nakað til fiskiskap vita saktans, at tað gongur altíð í bylgjum, tað hava verið ringar fiskitíðir og tað hava verði betri fiskitíðir. Vit eru møguliga, sigi eg niðri í einum aldudali júst nú, men tað er einki at ivast í, at tað eru aðrar grundir eisini, at vit fáa minni fisk, tað er tað sum allir eru samdir um eisini bæði andstøða og samgonga ,at vit hava ov nógv skip til at veiða, og tað verður ov lítið í part. Nei, eg vil ikki kalla hetta fyri kreppu, tí um vit fara og hyggja runt í Havnini í dag ella í Klaksvík ella í øðrum plássum í Føroyum, so, sær man onga kreppu nakrastaðni, har er eingin kreppa, men "liv og glade dage", teir dansa um gullkálvin, tað er sannheitan av tí. So tað er

bara nakað tvætl, at tað er nøkur kreppa. Tað eru onkur skip, sum hava tað nakað tungt, tað skal eg viðganga, men man skal ikki kalla tað fyri kreppu.

Góður sjómansskapur var fyrr, tá man sá, at tað dróg á luftína og tað fór at ætla í veðrinum, var at minka seglini. Eg haldi, at tá eg skal siga sum satt er, so dregur nakað á luftina, og tí haldi eg við fleiri øðrum, sum hava havt orðið her, at nú eiga vit at minka seglini. Nú eiga vit at taka fyrsta rep niður, men vit skulu ikki repa niður á slætt beinavegin, sum summir vilja halda, tí tað var ikki sjómansskapur. Vit skulu repa so hvørt, sum ódnarveðrið harðnar og so sjálvandi fer tað at lýsa í aftur, dregur tað frá aftur so loysa vit repið úr aftur og seta so full segl aftur. Soleiðis haldi eg at vit eiga at gera eisini í hesum føri.

Eg skal takka fyri orðið hesaferð.

<u>Anfinn Kallsberg</u> (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Nú brúkti undanfarni røðari nokk so nógv av sínari tíð at tosa um kreppur og tað var mín, hann sipaði til, tá hann segði, at fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum hevði boðað frá kreppu í 1984, tað er rætt.

Í 1984 vóru vit niðri í einum aldudali júst sum nú, men eg trúgvi at dalurin er djypri hesaferð. Tá gjørdu vit tað í løgtinginum og júst um hetta mundi í 1984, vit samtyktu nakrar nýggjar lógir, sum kostaðu landskassanum rættiliga fitt av peningi, men sum virkuliga fekk glið aftur á fiskivinnuna.

Tað er júst tann munur á tí sitandi samgongu og ta nú sitandi. Vit sóu, her var ein trupulleiki, vit gripu til og vit loystu trupulleikarnar beinavegin soleiðis, at vit riðu stormin av og eg skal garantera fyri, góðu fiskiárini, sum komu aftaná at høvdu vit ikki loyst kreppuna tá, so høvdu vit ikki havt tann flotan til at fiska og til at fingið tað ríkidømi í land, sum vit hava fingið hesi árini. So einfalt er tað.

Fyrsta fortreytin hjá sitandi samgongu fyri at loysa nakra kreppu, er at góðkenna, at her er ein kreppa. Tí áðrenn patienturin er sjúkur, kanst tú ikki grøða hann. Tí vil eg inniliga heita á tykkum um at fara runt og spyrja, tit kunnu spyrja útgerðarmenn, tit kunnu spyrja teir, sum lata útgerð til skipini, til snørisvirkir og trolvirkir, til skipasmiðjur og

heilsølur, sum lata útgerðina og oljufeløg, bankar og aðra staðni, spyrjið, stendur tað væl til hjá flotanum, er hann førur fyri at gjalda tað, sum hann skal, er hann førur fyri at gjalda sína útgerð, sum hann fær umborð hvønn túrin. Eg vænti, at svarið, tit fáa allastaðni, er tað sama, tað er svarta hopleyst at hava nakað við fiskiflotan at gera í dag, tíverri.

Poul Jacob Olsen (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Eg segði í mínum innleggi, at tað møguligt vóru skip, sum høvdu tað tungt nú, og tað er vist einki at ivast í, at tað er so. Men tað er ikki orsakað av tí politikki, sum hevur verið førdur frá

Poul J. Olsen (framhald) landsstýrinum als ikki, tað eru aðrar umstøður, sum gera seg galdandi, t.d. fiskaloysi tað hevur verið ov lítið at drigið, tað hevur verið tann stóri feilurin, men eg tosaði við fiskimannafelagsformannin fyri eini lítlari løtu síðani og hann segði, at hjá trolarunum, sum royna á landleiðini, er inntøkan hjá manningini betri nú enn somu tíð í fjør.

Hergeir Nielsen (tf.) viðmerking.

Harra formaður.

Tað skal verða ein stutt viðmerking til Anfinn Kallsberg, sum er helst tann, sum er dugnaligast at koma upp her saman við Svend Aage Ellefsen og onkrum øðrum fólkafloksmanni, at royna at sannføra okkum um, at tað er ein heilt álvarslig kreppa í hesum landinum og nú seinast heitti hann á okkum um at fara runt til sølufeløg og allar teir, ið fáast við vinnulívið og so frameftir fyri at spyrja, um teir ikki kundu siga okkum, at tað var ein álvarssom kreppa her í landinum.

Eg kundi hugsað mær at spurt Fólkaflokkin, um hann veruliga trýr uppá, at tað er ein stór kreppa, tá ið hann vartar upp við hesum veldugu íløgunum, sum hann trýr uppá, at hetta samfelagið hevur ráð til. Er tað eitt samfelag í kreppu, sum hevur ráð til at fara undir skúlar og sjúkrahús, sum Fólkaflokkurin hóast alt hevur tikið undir við. Er tað eitt samfelag í stórari kreppu, sum hevur ráð til at fara undir vegir, tunnlar, flogvøllir og undirsjóvartunnlar og so frameftir. Eitt heilt ærligt svar hevði verið uppá sitt pláss nú um ikki annað.

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerking.

Harra formaður.

Fyrst eina lítla viðmerking til Hergeir Nielsen.

Tað er soleiðis, at vit hava samtykt her á Føroya løgtingi íløgur fyri 1,5 mia.kr., sum skulu fremjast árini frameftir, og eg eri sandur, tað eru ógvuliga stórar íløgur, men fortreytin fyri, at hesar íløgur kunnu gerast veruleiki er tað, at vit hava eitt vinnulív, sum er ført fyri at bera hesar útreiðslur eisini í framtíðini.

Lata vit nú bara standa til, so vita vit, at allur okkara fjarfiskifloti fer undir hamaran fyrsta dagin, og so eru tær inn-

tøkurnar burtur, inntøkurnar á farmaskipaflotanum eru burtur, inntøkurnar á svartkjafta-íløgunum, sum eru gjørdar, tær eru burtur, tað vita vit, og minka vit soleiðis, at tað bert verður tað, sum trolarnir á føroyagrunninum, sum nú Poul J. Olsen, var inni á, verður eftir, sum skal bera hesar her íløgurnar, sum skulu gerast fram eftir í Føroyum, so er svarið til tingformannin, at so hava vit yvirhøvir ikki ráð til at gera eina einastu íløgu í tað føroyska samfelagið. Okkara sjónarmið er, at vit skulu styrkja okkara vinnulív soleiðis, at tað kann geva avkast, soleiðis, at vit kunnu fremja íløgurnar í samfelagnum frameftir.

Til Poul J. Olsen vil eg siga, at tað er gleðiligt, at manningarnar á trolarunum á føroyagrunninum hava eina hampuliga inntøku, men tað er bert ikki nokk, tí at tað verða eingi skip til hesa manningar at forvinna nakað við, um skipini ikki eisini hava ein yvirlivingarmøguleika, og tað er tað, sum er trupulleikin í dag, og tað eru hesi skip, sum ikki eiga nakran góðan í sitandi samgongu.

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking.

Harra formaður.

Tað var ein viðmerking til seinasta æraða røðara, tá hann hevði sína røðu.

Tað kom einum í huga, tá ein hoyrdi seinasti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, at tey fólk, sum ongantíð hava átt nøkur børn tey vita so ómetaliga væl, hvussu hini skulu uppala síni børn, tey eru serkøn.

Nú kemur Anfinn Kallsberg her sigur okkum um fiskivinnukonsolideringspolitikk, sum hann førdi, tá ið hann var landsstýrismaður.

Harra formaður.

Tað, sum vit arvaðu, tað vóru tómir veðhaldsgrunnar og vit hava ikki gjørt annað enn betalt effektiv veðhald vegna ábyrgdaleysar íløgur, sum vórðu framdar, tá ið Anfinn Kallsberg var landsstýrismaður í fiskivinnumálum og loyvir hann sær at koma her og geva okkum góð ráð. Víst eru tað trupulleikar, tað vita vit alt um, og eg havi altíð verið tann fyrsta til at vísa á, at vit skulu verða varin, men tað er nest sum ov nógv av tí góða, tá man hugsar um, hvussu nógvar milliónir vit hava bløtt, síðan vit royndu at rudda upp eftir seinasta æraða landsstýrismann.

Jákup Lindenskov (jv.) viðmerking.

Harra formaður.

Hér eru rúgvur av viðmerkingum, men tá í menn koma við viðmerkingum sum til dømis Anfinn Kallsberg, so haldi eg minsta mát má verða, at tað má verða eitt lítið sindur av skili í tí, sum hann sigur. T.d. sigur hann at inntøkurnar av farmaskipaflotanum eru burtur. Hevði hann kunnað vist okkum á, nær hesi farmaskip hava havt inntøkur, nær hava tey havt inntøkur?.

Tað, sum vit siggja nú, er, at skip, føroysk farmaskip eru farin í t.d. norskar hendur, hava fingið føroyskt navn, men hygg eftir, hvør er manningin, tað er ikki ein einasti føroyingur við skipunum, sum enn eru á føroyskum hondum, tað er tað sum Fólkaflokkurin hevur stílað fyri. Vit eiga í dag einki annað uttan ruðuleika á ti økinum ikki eitt klovið oyra til føroyska samfelagið higartil, hvar eru tær inntøkurna, hvar eru tær???

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerking.

Harra formaður.

Fyrst er tað Karin Kjølbro, sum tosar um tómar veðhaldsgrunnar undir seinastu samgongu og tað er rætt, eg trúgvi ikki teir vóru tómir, men tað vóru ikki nógvir pengar í teimum og tað var ikki nógv cirkulatión í effektivum veðhaldum í seinastu samgongu. Mær vitandi hevur núsitandi samgonga heldur ikki havt tað stóru cirkulatiónina av fiskiskipum, tá tað snýr seg um effektiv veðhald, tað er mest av farmaskipaflotanum, tey effektivu veðhaldini eru komin. Mær vitandi er tað bert við svartkjaftaveiðuni, at effektiv veðhald hava verið, tá tað snýr seg um fiskiskip, og har eigur hendan samgongan sanniliga meg sum bróðurpart, tað er einki at tosa um tað. Man skal eisini hugsa um, at henda samgongan hevur satsað víðari á svartkjaftaøkinum, hevur verið inni í uppaftur større veðhaldum á svartkjaftaøkinum og tey projektini verða ikki minni kostnaðarmikil fyri tann føroyska skattgjaldaran.

Jákup Lindenskov tosar um, at inntøkurnar frá farmaskipaflotanum komu ongantíð í tann føroyska búskapin. Tað er partvíst rætt, tað kom nakað, men tað kom ikki alt, men tær íløgurnar vóru gjørdar fyri ti fyri eygað, at gera okkara vinnu meira fjøltáttaða soleiðis, at vit ikki bert skuldu hava inntøkurnar frá fiski-

vinnuni at litað á. Tað var saktans eisini grundin til at sitandi samgonga hevur økt um aktivitetin á svartkjaftinum, tað var fyri at fjøltátta okkara vinnu. Vit kunnu verða samdir um, at tað er gott at hava eina so fjøltáttaða og eina so breiða vinnu, sum møguligt fyri á tann hátt ikki at verða so sárbærur, tá í niðurgangstíðir koma. Men eitt er givið, at halda vit á fram, sum tað gongur nú, so verður okkara vinnuliv minni og minni fjøltátta og tí meira og meira sárbært og so eri eg bangin fyri, at vit skulu bert hava eitt bakkast so liggur skútan bakk, sum Poul J. Olsen var inni á, og tað er tann vandin, sum eg síggi í øllum hesum her.

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking.

Harra formaður

Hetta skal verða seinasta viðmerking til seinasta æraða røðara.

Eg segði skeivt, tá eg segði, at veðhaldsgrunnarnir vóru tómir, teir vóru negativir, ógvuliga negativir, tá ið saman um kemur og tað, tað handlar um er, at tað hava verið 600-700 mió.kr. í effektivum veðhaldum meginpartin av okkara tíð, fyrst allur farmaskipaflotin so ein partur av svart- ?????? kjaftaflotanum, og mær kunnugt so flokkur hjá seinasta æraða røðara stiga hvørt tað einasta svartkjaftaskip Harra formaður, eg takið ikki orðið aftur til viðmerkingar.

Anfinn Kallsberg (ff.) stutta viðmerking.

Tað er fulkomiliga rætt, eg havi verið við til at styðja í nógvum førum ikki øllum. Nei, tey seinastu svartkjaftaskipi havi eg ikki verið við til, men eg kann siga Karin Kjølbro, at hennara flokkur í figgjarnevndini hevur verið við til at styðja hvørt tað einasta eitt veðhaldsútlegg fyri farmaskipaflotan undir seinastu samgongu eins og væl, sum flokkurin hevur verið við í nýsitandi samgongu til svartkjaftaævintýr.

Øssur av Steinum (tf.)

Harra formaður.

Løgmansrøðan er til viðgerðar. Henda røðan er ein samandráttur av samfelagsgondini hettar seinasta árið og síðan hendan samgonga varð skipað í 1985. Men løgmansrøðan er eisini tengd at framtíðarútlitum á flest øllum samfelagsøkjum. Stórur partur av arbeiðs-

setningi samgongunnar er nádd-ur, meðan aðrir eru eftir, sum t.d. undirgrundin.

Alivinnan er eitt av teimum vinnuøkjum, sum mangur hevði sett sær stórar vónir til, sum góður stuðul til búskap landsins, men mongum brestur ætlan og ikki allir teir, ið fóru inn í hesa vinnu við bjørtum vónum, siggja so ljóst upp á framtíðina longur. Orsøkirnar eru mangar, tað kann verða ókunnleiki, sjúka og so mangt annað. Tað sær út, sum íløgurnar til alivinnuna og lønirnar eru í fleiri førum so stórar, at vinnan illa orkar at bera hesar. Hjá teimum alibrúkum, har siglt hevur verið við smáum seglum, sær tó hampuliga út fíggjarliga. Teir 6-7 mánaðarnar av 1988 hava vit flutt inn fyri umleið 100 mió.kr. í alifóðri og hesin innflutningur kemur alsamt at vaksa so hvørt, sum vinnan verður útbygd, einki átti at verið natúrligari enn, at okkara egna samfelag, ið eigur meginpartin av rávøruni til alifóðurið skipar so fyrí, at alivinnan sleppur undan stórvegis innflutningi av alifóðuri í framtíðini, hettar hevði hjálp munandi til at minka um innflutning okkara.

Í løgmansrøðuni upplýsir løgmaður, at samtykt er at útbyggja støðina hjá Fiskaaling við Áir fyri umleið 50 mió.kr. tey komandi 4-6 árini. Ætlanin er ikki at økja munandi um framleiðsluna av smolti og matfiski, heldur skal støðin nýtast í nógv størri mun til royndir og greinsking, eisini skal støðin nýtast til praktiska útbúgving og eftirútbúgving av fólki, ið kemur ella longu starvst í alivinnuni. Hetta er at gleðast yvir og er ein stór hending, tí tað hevur undrað mangan, at Fiskaaling ikki longu hevur verið nýtt til hetta endamál í størrí mun. Sagt verður tó í løgmansrøðuni, at Fiskaaling ikki sum er, er útgjørt til hetta endamál. Loyvi mær at spyrja landsstýrismannin í alimálum, hvør sakkunnleikin er, ið komin er til tað niðurstøðu, at økið við Áir ikki er væl egnað til útseting á havbit? Tær stóru torvurnar, ið koma aftur av havbiti, ið standa uttanfyri laksafellurnar hár, prógva júst tað øvugta. Annað er, at fiskurin ikki torir ella sleppur inn fyri veiðumonnum, føroyskum eins væl og útlendskum, við alskyns lógligum og ólógligum fiskireiskapi, ið fiska har í døgndrift.

Harra Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður í alimálum. Noktið øllum fiskiskapi 200 metur báðum megin fellurnar,

so siggja tit, at sakkunnleikin hevur misstikið seg her.

Sagt verður, at tað eru gott 100 húski, ið hava sina ársinntøku av mjølkaframleiðsluni og roknað verður við einum samlaðum vøkstri í ár uppá 3% og nakað tað sama verður vøksturin í 1989. Kemur ein slíkur javnur vøkstur at verða ár um ár og nýtslan økist í sama mun, so stendur væl til. Nærum øll mjølkin verður nú seld í gjøgnum Mjølkarvirki Búnaðarmanna, einans slakir 12000 litrar vórðu í 1987 seldir privat. Fleiri og lítið prosent av allari mjølkini, sum er innvigað hjá mjølkavirkinum er fyrsta floks vøra, hetta er at glaðast yvir og sum orðatakið sigur: Søtur er sjálvgivin biti.

Í 1987 varð stuðningur latin til góð hundrað tons av neytakjøti og sama ár varð stuðningur latin til góð 56 tons av svínakjøti. Hyggja vit nærri at hesum tølum, sæst at tann einasti framleiðarin av svínakjøti, Svínagarðurin í Froðba skrivar seg fyri meiri enn helmingin av allari neytakjøtframleiðslu landsins, eisini verður upplýst frá svínagarðinum, at hendan nøgd teirra kemur at vaksa í ár til 65 tons og í 1989 til umleið 70 tons. Eingin veit, hvussu leingi vit kunnu fáa neyta- og svínakjøt frá yvirskotsgeymslum í felagsmarknaðinum og tí er rætt at geva stuðning til hesar kjøtframleiðarar.

Við bit og slit fingu vit í vár eina nýggja jarðarlóggávu, ið avloysir stórar partar av tí gomlu lógini frá 1937, henda nýggja lógin áleggur gørðum eina framleiðsluskyldu, verður hendan ikki hildin, er møguleiki hjá umsitingini at fáa annan festara í staðin. Jarðarráðið hevur nú fingið amboðið til at fáa bøndur við yrkisligum fortreytum og hegn at røkja jarðarbrúk. Meðan nýggja jarðarlógin krevur framleiðsluskyldu av gørðunum, má tað verða gjørt politikarunum púra greitt, at teir nú hava fulla skyldu til at skipa so fyri, at bøndur sleppa av við sínar búnaðarvørur allar ársins tíðir og ársins dagar fyri sámuligan prís. Hetta er eftur mínum tykki tað allar besta við hesi nýggju lóggávu.

Tað er ikki hissini kvin frá sambands- og fólkafloksmonnum um farmaskipaflotan, ið teir báðir andstøðuflokkarnir kasta samgonguni fyri at hava søplað butur. Sannleikin í hesum harmamáli er tann, at miðskeiðis í sjeytiárunum varð partsreiðarífyritøkan Star seinri Star Shipping stovnað, og keypti hendan fyritøka 6 gomul skip.

Fyrrverandi løgmaður Pauli Ellefsen var grannskoðari fyri øll skipini og hóast hesi skip vóru sera bílig og sigldu undir lúkurnar og meira enn tað, so bar hettar tiltak ikki til á pappírinum. Partsreiðarar máttu bløða hart og endin varð, at nakrir fáir fóru avstað við fyritøkuni. Starskipini gjørdust fyrinyndin hjá undanfarna landsstýri í farmaskipamálum og endin varð hareftir fyri teir, ið gylkaðir vóru at fara inn í hesar fyritøkur, gjørdust smeiturin nógv svárari enn við Starskipunum, tí nú vóru skipini nýggj og tølini heilt global. Øll vita, hvussu nógv landskassin misti av miliónum krónum í effektivum veðhaldum. Ævintýrið við hesum alt ov dýru farmaskipum vildu Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hildi fram við, um teir sótu við ábyrgd landsins í dag.

Mikil orðadráttur hevur verið í seinastuni, at landsstýrið hevur noktað ávísari kommunu ta lániupphædd, ið henda kommuna hevur roknað við á fíggjarlóg síni. Tað er sjálvandi keðiligt, at ein kommuna ikki fær ta fígging, hon hevur roknað við, men hin vegin er tað landsstýrið, sum í hvørjum einstøkum førí skal geva játtan um lántøkur. Greitt er, at alt ov lítið samskifti hevur verið millum kommunurnar øðrumegin og landsstýrið hinumegin um fíggjarmál, gongdin hevur her verið, sum best ber til. Tað er alla æru vert, at landsstýrið heldur aftur við at geva kommunum órímiligar lániheimildir til óproduktivar íløgur, men landsstýrið eigur at gera sær gjølligar ætlanir um, undir hvørjum formum tað vil loyva kommunum lántøkur í frantíðini. Tað eigur ikki at koma fyrí, at kommunur hava bjóðað sera stór arbeiðir út uttan, at fíggingin er í lagi, áðrenn útbjóðað verður.

Longu í 1965 legði Tjóðveldisflokkurin fram á ting lógaruppskot um eftirlønartrygging av øllum verkafólki landsins. Málið kom ikki í gjøgnum tá, men nú hevur so løgtingið viðtikið lógina um samhaldsfastaneftirlønargrunn, lógin fær gildið frá 1. januar 1990, tá skulu arbeiðsgevarar og løntkarar rinda hvørt sítt prosent inn í grunnin. Inngjaldið hækkar í stigum, til tað í 1999 kemur upp á 2% frá hvørjum parti. Fyrstu útgjaldingarnar úr grunninum fara fram frá 1. januar 1992, og øll fáa lut í arbeiðsmarknaðareftirlønartryggingargrunninum

Tjóðveldisflokkurin hevur havt medábyrgd av landsins stýri í skjótt fýra ár, ymiskt er, hvussu hevur gingist og sjálvandi eru mál loyst, sum flokkur okkara kundi hugsað sær øðrvísi, men ein fær ikki alt, ein ynskir í samarbeiði við fleiri aðrar politiskar flokkar. Tjóðveldisflokkurin rýmir ongantíð undan ábyrgd mótvegis hesum samfelag. Tað er sannføring okkara tjóðveldismanna, at tað ber til at fáa hetta fólk og hesa tjóð fram til fult sjálvræði á øllum samfelagsøkjum, og í tí treysti verður hildið fram.

Eyðun Videro (ff.)

Harra. formaður

Tað er viðgerð av løgmansrøðuni. Orðalagið er uttan iva rættiliga nógv merkt av, at skeiðið hjá nesi samgonguni er við at verða runnið út. Tað er valár og tað er væl einki ónatúrligt í tí, soleiðis hevur tað væl altíð verið og soleiðis verður tað væntandi framyvir. Men tá ein hevur sitið og lurtað eftir viðgerðini av hesum ymisku málunum, so kann ein ikki annað enn halda, at tann vanligi veljarin ella lurtarin úti um landið, hevur ilt við at skilja, hvat ið tingmenn meina vi, sparsemi, oyðslusemi, íløgur ella annað. Vit hoyra sama tingmann ella landstýrismann rósa sær av, at vit hava gjørt so og so nógvar íløgur fyri so og so nógvan pengar og tað hevur kostað so og so nógv o.s.fr., í næsta andarhaldi kann sami tingmaður siga, vit hava hildið aftur so og so nógv fyri at spara um útreiðslurnar hjá landinum við at minka um møguliga lántøku uttanlands og konsolidera okkum við at sett pengar inn o.s.fr.

Nú hava tingmenn hesa longu tíð, ið løgmansrøðan hevur verið til viðgerðar, gjøgnumgingið flest øll mál, so tað sum eg komi at siga verður rættiliga avmarkað og verður møguliga eisini tikið upp aftur av tí, sum aðrir hava sagt ella viðmerkt um somu mál, tað er heilt nátúrligt.

Harra formaður. Hendan seinasta løgmansrøðan hjá hesari samgonguni var sum vænta ein ávís uppgerð yvir politikk samgongunnar í farna valskeiði eftir sum tíðin hjá samgonguni er við at verða farin, meðan framtíðar politikkur verður stungin út av eini nýggjari samgongu. Eins og undanfarin ár viðgerð løgmaður búskapargongdina rættiliga gjølla og vísir á hvørji stig samgongan hevur

tikið fyri at tryggja eina javnvág í fíggjarstøðu landsins.

Nú er tað soleiðis, at fíggjarstýringin av landinum verður ikki bert fyrisitin av løgtingi og landsstýri, men eisini av kommunum og í enn størri mun av persónum og einstøkum feløgum. Høvuðsgrundarlagið undir at taln kann verða um ein búskaparpolitikk er, at ein framleiðsla liggur aftanfyri og at hendan framleiðslan kann seljast og vørur og tænastur kunnu keypast afturfyri. Í orðum løgmans skylst heilt týðuliga, at politiska sigti hansara er, at politiski myndugleikin skal stýra og so vítt gjørligt fyriskipa nærum allari menning av landinum. Hesum viðvíkjandi sigur løgmaður, at tað er burtur við at trútta um, at ávísur samgongufloKkur gongur við dulðum ætlanum um, at socialisera veiðu- og framleiðslutól og Fiskasølu fyri sportsins skuld, men her vil eg geva løgmanni púra rætt, at hann ger tað ikki fyri sportsins skuld, men hetta er heilt greitt ein ætlaður politikkur, sum hann hevur víst á fyrr. Hann segði jú eina samgongu upp, tí hann slapp ikki at føra, í dag er hann væl nøgdur og tað má vera tekin um, at nú fær hann møguleikan at føra tann politikk, hann ynskir á hasum økinum. So soleiðis sæð er hettar í tráð við hansara sannføring og tann førdi politikkurin væl hareftir.

Viðvíkjandi íløgum í skip, so vísir løgmaður okkum, at lagdur verður ein politikkur, ið skal avmarkað møguleikarnar hjá hvørjum sum helst at fáa sær skip, og verður hettar gjørt við at minka um stuðulin til skipabygging og lækka veðhaldini. Hetta kann ljóða væl í oyrunum hjá summum, men hyggja vit nú eftir, hvat tað eru fyri persónar, ið eiga skipini, so er skjótt at verða samdur um, at í høvuðsheitírnum eru hetta menn, fiskimenn, sum hava sett í veð bæði hús og heim fyri eina spennandi uppgávu bæði av egnum áhuga og fyri samfelagið sum heild, tað haldi eg, vit hava ógvuliga nógv dømi um.

Løgmaður vísir á, at lagður er nú ein sovorðin politikkur, at forða verður fyri ov stórum íløgum í skip og at minkaði stuðulin við veðhaldum vil føra til, at bert fá fáa gjøgnumført tey frægastu projektini. Hetta fær okkum so til at reisa spurningin, hígartil eru fyri so vítt øll skipaprojekt gjørd av veiðimonnum, við áralongum royndum og skulu nú hesir skiftast út við tað almenna skrivstovuveldið, og við hækkaðum studningi og veðhaldum? Hvørjir verða teir, ið

verða førir fyri at tíggja íløgur í nýggj skip? Tað verða neyvan teir vanligu fiskimenninir úti um landið, sum koma at hava ráð til tað. Hetta verður kanska eitt tað meinasta bakkastið fyri bygdirnar og bygdamenningina.

Løgmaður heldur, at okkara flakavinna soleiðis, sum hon verður rikin, eingi livilíkindi eigur og vísir á, at higartil hevur flakavinnan verið uppihildin við øktum studningi og umfordeilingum, men hettar fer at steðga, tí ongastaðni sleps eftir meira studningi. Nú er tað soleiðis at hendа flakavinna er eitt tað størsta bygdarmenningartiltak, ið vit hava í løtuni, øll hendan vinnan hevur útvikla seg í mong ár til tað, hon er í dag soleiðis, at ferskfiskabátar, flakavirkir og mong bygdasamfeløg eru ein einð, ið ikki uttan vittfevnandi fylgur kunnu missa sítt lívsgrundarlag. Tá sagt verður, at ikki sleps eftir meiri studningi, so undrar tað ein, at tað skal verða so knípi, tá tað snýr seg um fiskivinnuna, ið ber øllum samfelagnum uppi, meðan tá talan er um øll onnur øki er einki mark fyri, hvat kann fáast til vega av pengum. Innan fyri fiskivinnuna hava vit havt tvey áhugaverð øki, nevnliga alivinnuna og svartkjaftin, tíverri hevur alivinna verið fyri stórum bakkasti vegna sjúku o.a., men hetta er ein vinna, ið vit vænta okkum nógv av og sum vónandi í næstu framtíð kemur at verða tað íkast til føroyska búskapin, sum væntað og vónað hevur verið. Verri eru nokk útlitini hjá svartkjaftavinnuni, men hóast vána útlit, so verður kortini roknað við, at vinnast kann á trupulleikunum, her finnast stór ráfiskaríkidømi og hugsað verður tá framvegis um útvegir fyri framleiðslu av dýrum svartkjaftafløkum.

Í røðu sini nevnir løgmaður innan fyri landbúnað t.d. um jarðarlógina:
Sitat við formansins loyvi.
"Hendan nýggja jarðarlógin, tann sum varð samtykt í vár, er ein broyting av gomlu jarðarlóginni frá 1937. Hendan lógin leggur á framleiðsluskyldu og ger tað møguligt at fáa annan festara í staðin, um hon ikki verður hildin. Við hesum skuldu møguleikarnir hjá fyrisítingini at fingið festarar við yrkisligum fortreytum og hegni at røkja jarðarbrúk verið munandi betri enn eftir gomlu lógini." Her má eg síga, at eg eri ógvulig stórliga í iva, um hendan nýggja broytta jarðarlógin hevur so nakrar revoliserandi broytingar við sær annað enn

tað, at hesin parturin er orðaður á føroyskum nú, í staðin var hann á donskum frammanundan. Ti tað, sum var høvuðsendamálið við jarðarlógini, also tað, sum lá í ti uppskotinum, sum vit fingu, tað var at gera útvegir fyri at fáa økt um framleiðsluna, tað var heilt greitt, og eg var sjálvur við til at viðgera tað málið í landbúnaðarnevndini, og har høvdu vit so samrøðu við teir, sum fáast við framleiðsluna, bæði Jarðarráð og serliga Mjølkarvirkið og har fingu vit heilt og greitt at vita, at vit goymdu her í dag við teimum fjósum, sum eru í dag og teimum, sum eru við at verða uppbygd, so nærkast, við tað at framleiðslan er nóg stór. Tað vil siga tað, at tørvurin fyri at gera nakað fyri at økja um framleiðsluna var ikki til staðar og tí var eisini tann grein rættiliga nógv broytt í lógini, sum varð samtykt.

Bústaðarskylda verður tosað um, hana hava teir, sum sita við festinum eftir gomlu lógini. Teir hava framleiðsluskyldu, tað skal ein ávis innistøða verða, tað sum er hent í hesi lógini, sum varð samtykt, tað var tað, at tað er umsett til føroyskt eitt partur av henni, annars broytir hon væl lítið og einki av tí galdandi lóg sum er.

Nú var eg tíverri soleiðis fyri, at eg var burturstaddur í almennum ørindum, júst tá lógin kom fyri í tinginum, og fekk ikki gjørt mínar viðmerkingar til tað júst tá, men eg vil siga tað, at um eg var staddur her tá, so hevði eg uppskot til samtyktar um at sent málið aftur í landsstýrið, tað var so ikki gjørt av tí orsøk, at eg var ikki staddur her tá.

Síðani koma vit til eitt øki, sum er rættiliga áhugavert, sum allir hava áhuga í og sum vit í Sandoynni hava serligan áhuga í og sum altíð verður av natúrligum orsøkum, tá tingmenn fyri Sandoynna hava orðið, og tað eru samferðsluviðurskiftini.

Orsøkin er heilt einfalt tann at lívsgrundarlagið, øll framleiðsla, vinna hjá okkum, hon er treytað av góðari samferðslu, og einki at ivast í aftur í móti teimum størri oyggjunum í landinum, hevur Sandoyggin verið lagt aftanfyri, og tí hevur tað verið so stórur áhugi haðani at fáa samferðsluviðurskiftini í hóskandi góða legu. Viðvíkjandi samferðslumálum so verður í løgmansrøðuni nevnd um tvær krevjandi íløgur, nevnliga ferjulegu við Gomlurætt og undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi. Ferjulegan við Gomlurætt er eitt mál av stórum áhuga fyri Sandoyarfólk, hetta

mál fekk eina keðilga vend, tá núsitandi samgonga samtykti at flyta ferjuleguna úr ti ætlaða staðnum í Kirkjubø og norður til Gomlurætt. Men vit vita, at hettar varð ein politisk neyðloysn, men hon varð av samgongumonnum rættvísgjørd við teirri grundgeving, at við Gomlurætt kundi arbeiðið byrðja beinanvegin, so mong vóru orðini tá, og hvat siggja vit idag. Eg havi spurt meg fyri, einki arheiði er farið í gongd og landsstýrísmaðurin var eisini her uppi stutt frammanundan, og har segði hann at arbeiðið ikki er farið í gongd, men tað verður nú rættiliga skjótt og hatta eru somu orðini, vit hava hoyrt, líka síðan samgongan gjørdi av at fara undir hetta projektið við Gomlurætt, tað er ikki byrjað enn. Men sannkeikin man helst verða tann, sum ein av samgongumonnunum segði beinanvegin, at hetta málið kemur ikki í gjøgnum fyrr enn beint undan vali. Vit skulu bríka tað til valagn, og tað vísir seg nú, at tað kemur heldur ikki fyrr enn beint uppundir valið, men eg haldi at sandoyarfólk ikki kunnu bríkast soleiðis, so upplagt.

Eitt annað mál, sum landsstýrísmaðurin í samferðslumálumu eisini nevndi, var tann nýgga ferjan til Sandoynna og har havi eg skylt og havi eisini spurt meg fyri, at man er við at leggja seinastu hond á verkið til at kunna bjóðað hana út, so vónandi verður tað skjótt avgreitt.

Mong útreiðslukrevjandi mál vórðu samtykt, áðrenn tingið fór í summarfrið. Í røðu sini sigur løgmaður, at hesar íløgur mugu toyggjast yvir eini 8 til 10 ár. Vit hava verið vitni til, at nógvar stórar peningakrevjandi uppgávur eru settar í verk beinanvegin, og tað kemur illa við í sandoynni, at man nú tekur eina havnarætlan undir somu treytir, sum allar aðrar íløgur, at tær skulu toyggjast so langt yvir so langa tíð, at parturin, sum kommunurnar skulu gjalda er hækkaður munandi til havnagerðir. Frammanundan hevur kommunna partur verið 25%, nú er tað hækkað upp í 65% fyri størri kommunur og 30% fyri tær minnu kommurnar, tað vil siga kommunur undir 500 íbúgvar.

Kommunurnar hava ikki tíð til at bíða í so mong ár og tey arbeiði, ið verða sett í gongd, koma at verða figgjað við stórari rentubyrðu. Útbygging av havnini á Sandi er útboðin og verða tilboðini upplatin mánadagin, 22. august og hetta er eitt arbeiði, ið ikki kann bíða, tað hevur bæði týdning

fyri bygdina har og alla oynna sum hon er. Eínki endaligt fyriliggur enn um at byrja arbeiðið, nú, sum peningur er játtaður til í Skopun og í Skálavík, men tað er skilligt at tað verður tungt hjá eini kommunu sum Skálavík at skula gjalda 30% av 25 mió.kr. ella 7,5 mió.kr. til tað, sum har er játtað. Henda havn kemur helst eisini at kosta meira, og tíverri feldi løgtingið uppskotið, sum undirritaði legði fram um, at løgtingið játtaði 75 av 36 mió.kr. ella soleiðis, at kommunan í staðin fyri 30% skuldi gjalda 25% í sín part.

Í Skopun verður arbeitt við at víðka Pollin, men til landsstýrið er komin ein áheitan frá flokkunum í Sandoynni og frá bygdarráðslimum í Skopun um at nýta grótið frá dýpingini av pollinum til grótkast suður eftir grynnuni og er hetta ávegis í samband við ætlaða havnaprojektið Ø3, sum var fyri í síni tíð. Og tí fari eg at spyrja landsstýrismannin Lassa Klein, tí so vítt eg veit, hevur hann verið kunnugur við hetta líka frá byrjanini, og merkiligt nokk hatta varð fyriraikað beint upp undur fólkatingsvalið, men tað gav bara ikki tað stóra úrslitið. Hvat veit landsstýrismaðurin at siga mær frá hesum máli? Hvat ger landsstýrið við tað málið um at nýta grótið, sum verður sprongt út úr Pollinum at leggja út eftir grynnuni ávegis til projektið Ø3.

Harra formaður. Nú er tíðin farin, men eg fari at biðja um orið aftur, tí eg eri ikki liðugur enn. Takk fyri.

<u>Karin Kjølbro</u> (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Sum vit øll kenna, so er tað eitt orðatak, sum sigur, at tjóður trýr, at hvør maður stjelur. Nú hoyrdu vit, at væntandi er, at Gamla Rætt vit fara ikki undur Gomlu Rætt fyrr enn beint undan valinum, tað var undanfarni røðari, sum segði tað. Tá er vert at hugsa um, at á vári í 1984 fingu vit at vita frá háttvirda landsstýrismanni tá, at 1. apríl skuldi spakin setast í til ferjulegu í Kirkjubø, og alt var leyst og liðugt og klárt, ogso var tað málið endað.

Tað er klárt, at tá talan varð um at flyta ferjuleguna í Kirkjubø til Gomlu Rætt, so fara vit at spyrja eftir tí veldugu projektinum, sum skuldi setast í verk 1. apríl 1984, hvussu tað sá út, hvussu stór íløgan var og hvørt av sínum. Enn hevur eingin sæð ta verkætlan, sum landsstýrismaður

hjá seinasta ærəða røðara átti. Kanska hann er førur fyri at koma her og siga, hvar tann verkætlanin er, men vit onnur sum sita í samgong nú, vit skylja væl, at sagt verður, at vit vilja fara fram á sama hátt. mær vitandi er ein heilt stórur munur á hasum báðum málunum. Men eg skal boyggja meg, um hann kann dokumentera, at tað var greitt og so kann man kanska eisini dokumentera, hvør orsøkin var til ta samtykt, sum fyrilá at fara undur ferjulegu í Kirkjubø 1. apríl 1984 og einki hendi.

Lasse Klein (sf.) viðmeriking

Harra formaður.

Tað er so ógvuliga lætt at illgita og eisini at mistrúgva í sambandi við teir ymisku spurningarnar og soleiðis tóktist mær eisini, at Eyðun gjørdi í spurninginum um Gomlu Rætt. Arbeiðið upp á Gomlu Rætt er jú í veruleikanum langt síðani byrjað og soleiðis at skylja at spakin er ikki settur í enn, men allar fyrireikingarnar eru gjørdar og tað týðir eisini upp á tað at vit hava tikið hetta málið í djúpasta álvara. Eg vil viðganga, at tað hava verið ávísir trupulleikar, sum hava stungið seg upp, men eg kann ið hvussu so er upplýsa Eyðuni, at tað hava verið samráðingar við arbeiðsgevararnar og um eina lítla løtu, fái eg eitt bræv niðan higar úr Tinganesi, sum verður sent niðan til landsverkfrøðingin, har boð verður givið um, at allir endaligir praktiskir spurningar í samband við Gomlu Rætt eru avgreiddir og at spakin kann setast í. Um hann vil verða hjástaddur, so er hann vælkomin til tað.

Eyðun Viderø (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Fyrst til landsstýrismannin Lassa Klein. Tað hevur ikki verið talan um nakra mistrúgv, atfinningum ????at byggja á tann veruleika, at vit ferð eftur ferð hava fingið at vita, at projektið er klárt, at tað fer í gongd nú fyrsta dagin, og hann veit, hvussu leingi tað hevur hent, og har er einki hent enn. Trupulleikarnar sum hava verið á vegnum, kann eg ikki.

Síðani skal eg venda mær til Karin Kjølbro háttvirda løgtingsmann. Av góðum grundum kenni eg ikki alt út í æsir sum fyrigekk við projektinum í Kirkjubø í 1984 og tað framman-undan,

tí eg var ikki tingmaður tá, men eg veit, og Karin veit tað betur enn eg, at ein tiltikin stór sendinevnd var eisini niðri, hvar hetta projektið varð roynðarkoyrt noiri í Keypmannhavn. Tað duga bæði eg og Karin Kjølbro at skylja, at einki so dýrt og stórt projekt, sum tað at koyra tað í gjøgnum eina labratoriukanning verður gjørt, um einki projekt liggur aftan fyri. Men eg havi skylt, at tað vóru óvísir formalitetir, sum ikki vóru greiddir, at tað ikki kundi farast ígongd tann 1. apríl, sum talan varð um. Eg loyvi mær at standa fast upp á, man kann ikki prógva nakað, tá tað ikki er hent, ella man hevur ikki fingið møguleika at fingið tað hent, at um tað projektið varð fasthildið at gera ferjlegu í Kirkjubø, so standi eg fast upp á, at málið var byrjað í dag, so mikið langt varð tað komið. Takk fyri.

Jógvan Durhuus (tf.)

Harra formaður.

Til viðgerðar er løgmansrøðan í 1988.

Av tí at hetta er síðsta løgmansrøða hjá hesi samgongu, so er rimiligt, at tikið verður saman um fyri samgonguskeiðið.Í byrjanini av røðuni sigur løgmaður, at sjáldan er so stórur partur av einum samgonguskjali vorðin veruleiki sum hesaferð. Hesum kann eg sum landsstýrismaður bert fegnast um, og taka undir við. Men tað eru kortini stórmál, sum eftir eru at loysa sambart samgongskjalið, og er tað undirgrundarmálið, sum eg her hugsi um.

Vónandi koma vit til eina uppkláring í hesum týdningamikla máli, tá ið vit í næstum, síðst í hesum mánaði taka upp aftur samráðingar við donsku stjórnina. Tjóðveldisflokkurin stendur kletta fastur um løgtingssamtyktirnar um undurgrund og havbotn soleiðis, at hetta málsøkið verður yvirtikið sum føroykst sermál, sum eisini er fyriskrivað í samgonguskjalinum. Eg skal tríva í tey málsøki, sum verða umrødd í frágreiðingini við serligum atliti til tey øki, eg sjálvur havi umsitið í landsstýrinum. Í innganginum verða fortreytir fyri búskaparviðurskiftunum umrøddar og hava, sum náttúrligt er við so einvísum útflutningsmøguleikum, konjunkturum, prís- og sølumøguleikum, marknaðarviðurskiftini í keyparalondunum havt sína stóru ávirkan á hetta. Afturat hesum koma so tey ógvuliga ymisku veiðiúrslitini hjá teimum skipum, sum í dag veiða eitt nú í kanadiskum, grønlendsk, íslendskum, føroyskum,

norskum, russiskum og øðrum sjóøkjum. Stutt sagt hyggja vit at handilsjavnatølunum, so vísa tey klárt, at útflutningurin hækkar ikki lutfalsliga eins og innflutningurin. Orsøkirnar eru í høvuðsheitunum framhaldandi og lágir fiskaprísir, útflutningsprísir og í einstøkum førum svikjandi fiskiskapur. Menn sláa seg til táls við hesum og siga at soleiðis hevur tað verið og soleiðis fer altíð at verða. Kann verða, at so er, men eitt mugu vit gera okkum greitt, at um vit ikki fáa meira samvinnu í millum søluliðið og studningsliðið, so kemur ikki vend í umsóknir um serlán, hetta ber boð um, at veiðiflotin í løtuni er í andróðri, men soleiðis var eisini síðst í sjeyti árunum og vónandi kann tann serlánsveiting, sum nú er samtykt, hjálpa okkara veiðiflota úr tí aldudalí, hann er í í løtuni, eins og skipanin hjálpti, tá ið vit settu til síðst í sjeyti árunum.

Eg skal koma inn á skúlamál. Viðvíkjandi skúlamálum so skal fyrst verða víst til samgonguskjalið, hvar vit løgdu dent á at útbyggja vinnuskúlarnar sum mest, og skal egtí taka saman um. Sambært uppskoti frá landsstýrinum var heimildarlóg til fígging og bygging, uppíbygging av tekniska skúla og handilsskúla á Kamsdali samtykt í løgtinginum 1986. Bygging av hesum skúlum er í gongd, og væntandi verða hesir bygningar lidnir komandi ár. Løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskiíðnað og havbúnað varð samtykt í 1987 og somuleiðis varð samtykt sama ár at seta á stovn sjóvinnuskúla í Føroyum.

Á Føroya maskinskúla hevur tann fyrsti flokkurin tikið viðkað maskinmeistaraprógv og farið er undir at fyrireika upptøku av næmingum til instalatørútbúgving, so fyrsti flokkurin kann byrja 1. januar 1989. Ætlanir eru eisini at fara undir dunaskapsroynd í motoransing í januar komandi ár. Landsstýrið hevur biðið landsskúlafyrisitingina um at gera uppskot til lóg um maskinmeistaraútbúgving, so vit fáa føroyska løggávu á øllum hesum útbúgvingarøkinum, hvar hon er donsk í dag. Landsstýrið hevur lýst løgtingslóg nr. 62 um ávísar skúlar, og hava vit í hesum sambandi heitt á landsskúlafyrisitingina um at fara undir at fyrireika projektering og bygging av teimum skúlabygningum, sum har eru umrøddir og gjørt vart við, hvørjir skúlar eiga at koma í frenstu røð. Tað vil siga, vit vilja hava eina prioritering eisini út frá tí, at byggiaktivitetur-in er stórur í

hesum landi, og tað má laga seg eftir tí.

Fyrireikingar eru farnar í gongd til tess at seta á stovn yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað í Vestmanna, so hesin kann byrja í leiganum hølum í januar í komandi ári. Ætlaða uppí-og umbyggingin á sjómansskúlanum í Havn er nú farin av álvara í gongd og vit hava fígging til at rinda tað, sum skal gerast við tað, at vit tvey tey síðstu fíggjarárini hava avsett munandi peningaupphæddir til hetta endamálið. Av tí at Føroya maskinskúli húsast undir ótolandi viðurskiftum, so er bygging av hesum skúla frammalaga í okkara skúlabyggiætlan. Somuleiðis er við studentaskúla í Eysturoynni, sjóvinnuskúla í Hovi og bygningi til gymnasiala útbúgving á sama stað, so sum samtykt í oman fyri nevndu lóg, sama er at siga um skeiðháskúlan á Sandi. Leiðari er settur á landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð og er arbeiðið við innrætting av hølum farin í gongd. Umframt nevndu skúlar so eru fleiri uppskot frammi um nýtímansgerð og bygging av skúlum, hallum og ungdómshúsum og ítróttarvallum og nógv er gjørt í hesum landsstýrisskeiði á hesum øki. Onkur vil kanska siga ov nógv, men hetta er gjørt serliga til frama fyri okkara ungdóm og fyri ungdómsarbeiði, so vit meta, vit fáa tað aftur.

Grunnurin til útbúgving er munandi vaksin undir hesum landsstýrinum og skal eg vísa til fíggjarlógirnar, síðan hetta landsstýri, tók 1985, 1986, 1987 og 1988, sum vóru ávikavist upp á 4,5 mió.kr., 8 mió.kr., 10 mió.kr. og í hesum árinum 15 mió.kr.kr. Arbeitt hevur verið við lógaruppskoti fyri grunnin, og kemur hetta lógaruppskot eisini at galda fyri SU studningin, sum er í blokkinum. Hetta uppskot verður lagt fyri tingið fyrsta dagin, og hevur hetta uppskot skund, við tað at henda studningsskipan skal verða galdandi fyri hetta skúlaárið. Uppskot til reglugerð í samband hetta lógaruppskot er eisini koni væl ávegis. Tað skal verða mín vón, at vit longu í miðum komandi mánað hava hesa skipan greiða.

Heilsumál. Tá ið heildarveitingin ella blokkstuðulsskipanin kom í gildi tann 1. januar í ár komu ymisk øki innan heilsuverkið, sum ríkisumboðið áðrenn hevur umsitið, undir føroykst ræði. Talan er um kommunulæknar, sum nú verða settir og loystir úr starvi av landsstýrinum, somuleiðis kanning av børnum og barnakonum, sum læknarnir gera eins og skúlalæknatænasta. Somuleiðis er landsstýrið tann yvirskipaði myndugleikin fyri skipaniní av

heimasjúkrasystrum, pinkubarna-heilsusystrum og skúlaheilsu-systrum. Í samgonguskjalinum stendur, at heimahjálparaskip-anin og heimasjúkrasystraskip-anin verða samskipaðar. Eftir áheitan frá landsstýrinum hevur leiðslan á heimasystraskipanini gjørt eitt uppskot um, hvussu hetta kann gerast og hetta upp-skot er í dag til viðgerðar í landsstýrínum. Hjálpitólarmið-støðin er nú farin til verka í fyribils hølum á Argjum og hevur virksemið hjá støðini longu prógvað, at stórur er á hesum tiltaki. Serlækni í sam-felagsfrøði, arbeiðslæknafrøði er settur og verður hetta til-tak uttan iva til gagns fyri arbeiðsfólkið og samfelagið í sini heild.

Landsstýrið hevur keypt landslæknahúsini og hýsast nú har heilsurøktin, landslækna-embætið og arbeiðslæknaserfrøð-ingar. Ætlanir eru frammi um at halda eina ráðstevnu í heyst, um hvat kann gerðast fyri at minka um vøggudeyða. Stríðið móti eyðkvæmi ella AIDS heldur fram, eyðkvæmistelefonlinjan svarar alt samdøgnið og fólk kunnu framvegis ónevnd leita sær ítøkilig ráð gjøgnum tele-fonina. Harumframt er peningur játtaður til fleiri bóklingar og faldarar um evnið og somu-leiðis til stuttfilmar. Hotel Tórshavn í Keypmannahavn er munandi víðkað við tað, at ein hædd er leigað og tikin í nýtslu afturat soleiðis, at bústaðarhølini nú eru tvífald-að. Henda nýggja hædd er ný ístandsett, og fara í løtuni fyrireikingar fram til ístand-setan og nýmótansgerð av tí eldra partinum av leigumál-inum.

Viðvíkjandi heilsumálum so hevur útbyggingin av teimum trimum sjúkrahúsunum havt stór-an áhuga seinastu 10 árini og nú er uppskot samtykt í tingín-um, sum heimilar landsstýrinu at taka upp neyðug lán og áleggur okkum at seta pening av á komandi fíggjarlógum til út- og umbygging av teimum trimum sjúkrahúsunum umframt sjúkra-systraskúla og næmingaibúðum til hesar. Í Klaksvík er út-byggingin byrjað og eru fyri-reikingarnar til hinar útbygg-ingarnar komnar væl ávegis. Viðvíkjandi tí, sum er farið fram annars seinasta árið inn-sjúkrahúsverkið, kunnu tingmen kunna seg við hetta aftast í fylgiskjølunum til løgmansrøð-una. Løgtingslóg um apoteks-verkið og heilivág er samtykt í vár í tinginum.

Landbúnaðarmál. Nýggj jarðarlóg er samtykt eftir drúgva viðgerð í landbúnaðar-nevndini og tað var ein ikki sørt skuffaður fólkfloksmaður, sum var uppi her í áðni. Hann harmaðist um, at hann ikki var

hjástaddur, tá ið hon var fyri í tinginum, tí var hann staddur her, so hevði hann mælt til, at hon var beind aftur í landsstýrið. Tað undrar meg eitt sindur at hoyra at hesin maður, sum eg annars hevði mett, var ein av teimum sum hevði nakað skil fyri jarðarbrúki, skal siga hetta og ikki minst, tá vit vita, at undergongumaður min í búnaðarmálum var landsstýrismaður hjá fólkaflokkinum, hann legði eitt ógvulíga líkt uppskot fram. Harafturat at málið hevur fingið so langa viðgerð í nevnd, sum einki annað tingmál nakrantíð hevur fingið. Tað er ongantíð ein nevnd, haldi eg, sum hevur sitið í 3 ár og arbeitt við einum máli. So mín var ið hvussu so er, at teir tingmenn, sum vit valdu við ógvuliga góðum skili fyri landbúnaðarmálum, ið hvussu so er funnu fram til, hvussu jarðarlógin skuldi síggja út, men sum sagt, hann var skuffaður og tað harmar meg, men vit hava so fingið eina lóg sum hevur gjørt lóggávuna einfaldari tað vil siga, at umsitingin skal hava lættari við at arbeiða við henni. Seinastu 10 árini er mjólkaframleiðslan vaksin við sløkum 4 mió. litrum til knappar 6 mió. litrar og tað er rætt, sum Eyðun Viderø sigur, at vit eiga her at verða eitt sindur varnir, vit skulu helst ikki fara upp á eina yvirframleiðslu, men har kann eg skoyta uppí, at næstan ájavnt við vøksturín av framleiðsluni, er nýtslan vaksin. Í dag brúka vit í millum 7 mió. og 7,5 mió.-litrar av mjólk, tað vil siga at tað restar 1-1½ mió. litrar ið at verða nøktandi so. Um so tey fjós, sum nú eru í gerð fara at geva av sær, so trúgvi eg, at vit koma nokk at brúka tað, sum er ætlað framyvir.

Avloysingaskipanin hevur nú virkað í 3 ár og útvigar Royndarstøðin enn bert í ávísan mun hesa avloysing, og ti hava bøndirnir sjálvir fingið sær avloysarir, men so við og við er ætlanin, at Royndarstøðin skal verða tøk til at senda avloysarar út.

Arbeitt verður við at seta sláturvirki á stovn. Lógarheimildin er brotin, so peningur kann fáast úr jarðargrunninum til hetta endamál.

Orkumál. Landsstýri hevur játtað lán til utbygging av fjarhitaskipan í samband við Sundsverki. SEV og Tórshavnar kommuna hava stovnað felag, sum skal fyriskipa projekt og nýtslu av avlopshitanum frá kraftverkinum á Sundi og brennistøðini á Sandvíkarhjalla. Annars skal eg vísa til samandráttin í fylgiskjølunum, sum greidliga lýsir, hvat ið er

hent í orkumálum, tó skal eg siga frá at tann streymmátarin, sum varð lagdur út í Vestmannasundi í juli mánað nú er tikin uppaftur, og bíða vit nú eftir einum svari úr USA, hvar hesin mátari verður avlisin, sum skal siga okkum, hvørt tað fer at loysa seg at fara undir hetta. Úrslitið av hesi kanning er av al stórum týdningi, tí úrslitið sum sagt tann regularitetinum í streyminum hann hevur hesín mátarin mált og hann verður lagdur niður aftur á einum øðrum stað, sum skal vísa, um styrkin er nóg nógv at fara eftir, so tað er við spenningi vit bíða eftir hesum projekti.

Harra formaður. Samanumtikið so er væl komið av skafti hjá hesi samgongu og serliga nógv eiga vit at fegnast um, hvussu væl tað hevur hepnast at fáa landskassan likvidan aftur. Allir grunnar vóru negativir í 100 tals mió.kr., tá ið vit komu til. Trekkið á Tjóðbankanum var í topp, landskassin var tómur; her er vend komin í, landskassin hevur nú pening at svara skyldur sínar við. Tómdir grunnar hava pening at svara skyldur sínar við, hetta hóast vit hava rinda 100 tals av mió.kr. fyri effektiv veðhald, sum vit arvaðu aftan á síðstu samgongu. Við øðrum orðum samgongan kann við góðari samitsku fara til val, nú vit hava fingið skútuna aftur á beint. Takk fyri.

Eyðun Viderø (ff.) viðmeriking

Harra formaður.

Eg skal fyrst takka landsstýrismanni Jógvan Durhuus fyri tað álit, hann hevði á mær við mínum kunnleika til jarðarbrúk sum limur í landbúnaðarnevndini, men eg má skuffa hann soleiðis sæð, at eg havi ikki arbeitt nógv innan fyri jarðabrúk sjálvur, men uppvaksin har sum jarðarbrúk er rættilig týðandi vinna. Eg haldi sjálvur, at júst tað, at eg hevði so frægt skil á jarðarbrúki, sum eg havi, gjørdi tað, at eg ikki kundi verða við til hatta uppskotið, og eg segði tað eisini undir 1. viðgerð í tinginum, at eg væntaði ikki, at eg tók undir við hasum málinum, so sum tað lá fyri og landsstýrismaðurin veit eisini, at ein orsøk til, at tað var so leingi at fáa hetta málið í gjøgnum í landbúnaðarnevndini, var júst tað, at jú meira, ið hesir limir kannaðu málið og settu seg inn í tað, sum veruliga lá aftan fyri tað fyrru lógina gjørdi tað, at tað uppskot sum kom fram var lítið og einki eftir av tí, tað var næstan alt boytt, til dømis ein týðandi spurningur, sum var at kunna

taka hesi smáu brúkini og leggja tey saman í brúk fyri at gera brúkseindir, og tað var eitt týdningarmikið punkt í hesum málinum, men tað var júst tað, eitt høvuðspunkt, sum gjørdi tað, at vit kundu ikki fáa tað framaftur, tí hesir góðu limir, sum kendu til lívi úti á hesum smáu bygdunum, vóru klárir yvir, hvørjar fylgjur tað fekk, um man fór eftir teimum smáu festunum og tók tað frá teimum, sum sita við teimum. Hesi festini sum kanska gjørdu tað, at kanska nógv av hesum fólkunum støðaðust úti á hesum smáu bygdunum og útoyggjunum. Tað var m.a. eitt, og tí meini eg tað, at tá avtornaði, var so lítið eftir av hesum uppskotinum og tí, sum varð samtykt, at tað hevði lítlan og ongan týdning. Tað skuldi verðið gjøgnumarbeitt aftur av nýggjum og fingið eina heilt aðra viðgerð. Takk fyri.

Henrik Old (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tað hevur verið fílsa á, at hetta tók sína tíð og tað er rætt. Landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum burdi vitað, at tað er ongantíð lætt at velta upp úr nýggjum, og tað tekur jú sína tíð, áðrenn man sær nakrar frugtir. Tað gjørdi tað eisini í hesum málinum, men hetta hevur jú verið væl og virðiliga tukt í 50 ár og tað er eingin loysn komin og tað er eingin broyting komin og menn hava viðgjørt hetta í hesi 50 árini, sum eg dugi at hava funnið fram til. So um tað tók nakrar dagar meira ella minni, haldi eg ikki var tann stóri skaðin í tí. Tíverri vísti tað seg tá lógin varð lýst, at hon er skeivt lýst, sum so nógvar aðrar serliga teir síðstu mánaðarnar. Man má vóna at tað verður ein rætting innan fyri teir nærmastu dagarnar. Eyðun Viðerø var so harmur um tey smáu brúkini tað var jú tað sum varð nógv diskutera, og tað var sanniliga í lóginí, sum landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum legði fram í sínari tíð, har var sanniliga eisini, at man skuldi taka smú brúkini og at man skuldi leggja tey saman og tað varð væl og virðiliga tugt í hesi nevndini og man kom til tað úrslit, at tað førdi ikki til nakað gott fyri tey smáu plássini at leggja saman, og tí vórðu menn sandir um burtursæð frá Fólka- flokkinum, at man ikki skuldi leggja saman á smábygdum, tí tað fekk keðiligar fylgjur. Takk.

Ivan Johannesen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var til Jógvan Durhuus sum var uppi her.

Tað hevur verið fer aftan á fer sagt og tikið upp í saman um hesar negativu grunnarnar, og so hevur tað serliga verið ein grunnur, sum hevur verið framtikin, tað er hesin her veðhaldsgrunnurin, sett av móti tapi av lánum og veðhaldum, og eg kann ikki trúgva, at landskassans roknskapur at er skeivur, tað kann eg ikki trúgva. Ti um vit hyggja í roknskapin, um vit byrja við 1983 og 1984 so stendur har, sett av móti tapi av láni og veghaldum, saldoin pr. 1. apríl í 1983 er 49 mió.kr. positivt also og 210, og so er ein løgtingsjáttan fyri 1983 og 1984 upp á 10 mió.kr., so eru innkomnar rentur upp á 9.730 kr. og so ein umbóking upp á 2.957.000 kr. Tað vil siga, at í grunninum standa 62.177.000 kr. So fara vit yvir í næsta ár, har stendur, at í grunninum pr. 1. apríl 1985 eru 71.864.000 kr., og so hava teir eina løgtingsjáttan í 1985 upp á 13 mió.kr., tað vil siga, har eru 84.864.000 kr., so er eitt tap innkomið uppá 5.100.000 kr. tað vil siga, í grunninum eru 79.862.000 kr. Um man tekur tað frá gjaldstovuni, tað hevði eg her frammi í gjár, eg eri klárur yvir tað, at tað hava verið nógv veðhaldsútlegg, í síðstuni, tað er fultkomiliga rætt, og samgongan hevur eisini sett nokk so nógvar pengar av til veðhald, tað er rætt, so stendur, at tann 30. juni 1988 var veðhaldsgrunnurin uppá 292-mió.kr. og effektiv veðhaldsútlegg vóru 450,3 mió.kr. tað vil siga, at grunnurin er negativur við 157,7 mió.kr. also pr. 30. juni 1988. Og hetta er skriv, sum also ein og hvør hevur atgongd til. Eg kann ikki trúgva, tað er nakað skeivt í landskassans roknskapi. Takk fyri formaðurin.

<u>Eyðun Viderø</u> (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var ein lítil viðmerking til Henrik Old, sum vit vita var formaður í landbúnaðarnevndini, sum hevði havt málið um broyting í jarðarlógini til viðgerðar. Eg haldi, at Henrik Old skal ikki vísa til tað fyrra uppskotið, ti eg segði týðuliga, at eg var ósamdur við tað. Eg var eisini ósamdur við tað, sum henda samgongan legði fram, og vit vita, at Fólkaflokkurin, sum so stóð heldur ikki aftan fyri uppskotið, sum Páll Vang í síni tíð legði

fram. Tað var lagt fram mest sum til tingsins viðgerð, og hann var ikki samdur um tað.

Øssur av Steinum (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Ein lítil rættleiðing til Eyðun. Hann sigur, at ætlanin við nýggju jarðarlóggávuni var at økja um framleiðsluna og tað hevði man koyrt burtur úr hesum her, soleiðis síggi eg ikki upp á tað, og sum eg segði í røðu míni, við tað, at framleiðsluskylda skal setast á brúkini, so kemur framleiðslan automatiskt at vaksa og økjast, men tað besta við hesi nýggju lógini er eisini, tað at vit hava latið bóltin upp til politikararnar, og nú mugu teir eisini syrgja fyri, at sleppast kann av við hesa framleiðslu til eina og hvørja tíð hvønn dag í árinum fyri sámiliga samsýning, tað er ein veldug broyting, tað var alstt ikki í tí gomlu lógini.

Jóngerð Purkhús (tf.) viðmerking.

Harra formaður.

Tað var Ivan Johannesen, sum spurdi um nakað, og um tølini ikki vóru rætt, tá eitt skjal frá gjaldstovuni visti, at tað beint í løtuni ella 31. juli stóð eitt minus í veghaldsgrunninum upp á 157 mió.kr. jú tað er rætt, tað er helst júst bóka soleiðis nú mitt í árinum. Men tað er soleiðis, at vit hava eitt yvurskot frá 1987 fyri upp á einar 290 mió.kr., sum tað sær út nú í løtuni, og á sama hátt sum vit í fjør komu við eini serligari lóg við at bíta yvirskotið fyri at fáa ordan í roknskapin, so koma vit aftur við einari lóg í ár soleiðis, at tá árið er liðugt, skuldi hasin grunnurin verið ajour. Munurin, kann eg siga, í januar 1985, tá vit yvirtóku allar grunnarnar og tá ið árið 1987 var úti ella tað, sum vit eru í nú, var at tað bæði aftast á fíggjarlógini var minus og í grunninum var minus, meðan tað nú er eitt stórt plus á fíggjarlógini. Men nú mitt í árinum hava vit goldið nakað meira út, enn tað vár játtað upprunaliga, og tí er tað bara ein bókføringsspurningur at flyta nakað yvir í grunnin, tað ávirkar ikki likviditetin ella teir pengarnar, sum eru innistandandi hjá landskassanum. tað lógaruppskotið kemur í hesum mánaðinum.

Eyðun Viderø (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Nú gjørdust hesar viðmerkingarnar eitt sindur fløktar við tað, at tær komu í røðuna hjá landsstýrismanninum, og hansara røða gekk jú í fleiri økir. Tað, sum eg nú havi verið inni á hevur verið um búskap ella fíggjarstøðu og so landbúnað og hvørt um annað, so tað kann virka eitt sindur villleiðandi. Men tað, sum Øssur av Steinum nevndi um framleiðsluna um øking av framleiðsluni, also tað, sum lá til grund fyri mátan, man m.a. skuldi økja uppá, tað var við at leggja brúk saman. Tað var í samband við tað, at man segði, at tað var ikki neyðugt at økja framleiðsluna, at mar vildi leggja brúk saman, hesi smærru brúkini og enntá ein annar limur í nevndini visti ógvuliga týðulig dømi at vísa, hvørjar fylgjur tað kundi fáa nevnliga fyri hansara bygd, um festini vóru tikin og løgd saman. Also tað kann hava keðiligar fylgjur fyri bygdirnar og óneyðugt, tí tað var ikki fyri at økja um framleiðsluna, tí hon var á veg til at verða so stór við tí, sum var í gongd við verandi festum. Takk fyri.

Henrik Old (jv.)

Hatta er nokk eitt eindømi harra formaður fyri Fólkaflokkin at man fer eftir fer kann boða frá, at landsstýrismaðurin kemur við einum uppskoti, sum flokkurin ikki stendur aftanfyri, og har var aftur eitt dømi um tað.

Sjálvandi kann tann maðurin, sum er í tinginum ikki standa aftan fyri har ella tann sum, ikki er í tinginum, ikki svara fyri tað, men at eingin maður í fólkaflokkinum hevur staðið aftan fyri hetta uppskotið, tað ljóðar nokk so fantastiskt, at ein landsstýrismaður í einum flokki kemur niðan við einum uppskoti, sum eingin maður í flokkinum tekur undir við, tað má verða eindømi fyri Fólkaflokkin at tað ber til at fáa ein landsstýrismann at leggja hetta uppskot fram sum eingin maður í flokkinum hevur tikið undir við, sum vit fingu at vita nú tað loyvi eg mær at ivast alvorliga í, at tað kann passa. Fólkaflokkurin hevði enntá møguleika at taka undur við tí partinum, hvar man segði, man ikki legði saman í hesum uppskotinum. Sjálvt ikki har kundu teir atkvøða við, eingin fólkafloksmaður reisti seg upp og atkvøddi fyri tí partinum, sum segði, at man ikki legði saman.

Síðani vil eg leggja aftrat eisini, at tann tíðin, tað tók kostaði ikki samfelagnum nakað, ti at nevndarlønin var so at siga eingin, so at tað tók eitt sindur longri tíð, tað hevur ikki kostað nøkrum nakað. Takk.

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður.

Tað var hetta her við hesum veðhaldsgrunnunum, sum er nok so áhugaverður. Nú sigur landsstýrismaðurin hjá okkum, at hallið í landskassanum upp á 157 mió.kr also hallið í veðhaldsgrunnunum, tað verður umbókað, nú yvirskotið í fíggjarárinum 1987 skal bókast fyri at fáa hetta at ganga upp. Men vit hava jú avtikið lógina um, hvussu landskassans yvirskot skal býtast, so automatiskt hendir tað ikki, og tað skal henda við einum lógaruppskoti her uppi. Eg fari at spyrja landsstýrismannin, nær tað uppskotið kemur, ti tað er væl sagtans júst hesar somu milliónirnar, man hevur í huga, tá ið man nú skal fara at játta eina eykajáttan til fiskivinnuna komandi ár, tí at á fíggjarárinum 1988 verður einki yvirskot hvørki til eitt ella annað.

Tað framgongur av roknskapinum fyri 1984 og 1985, at hallið í veðhaldsútlegginum er upp á umleið 50 mió.kr. har áleið, í dag er tað 157 mió.kr., sjálvt um útleggini eru stór, tað er minus 50, ja, tað er hall í landskassanum, also tað er trekt upp á landskassans likviditet, tað er meira útlagt enn tað, sum er avsett í grunnum, so har er støðan nú faktiskt 100 mió.kr. verri enn, hon var fyri 4 árum síðani. Men munurin er bara tann at fíggjarlógin fyri 1987 gevur helst møguleika at kunna bóka nakað inn í henda grunnin. Nú veit eg ikki um tað verða upp aftur fleiri veðhald effektiv, tað verða tað allarhelst, og spurningur mín til landsstýrismannin skal verða, øll hesi veðhaldsútleggini, sum eru gjørd, eru tey avskrivað í landskassans roknskapi? Er tað ikki soleiðis, at tað er møguligt hjá landskassanum at fáa nakað av hesum peningi innaftur, ella verður als einki gjørt við tað í dag.

Ivan Johannesen (sb.)

Harra formaður.

Grundin til at eg kom inn á henda spurningin við hesum veðhaldsútleggum, er, at samgongumenn have brúkt hetta

ferð aftan á ferð her á palli, og tað hevur verið sagt, at hetta er nakað, sum hevur tyngt samgonguna nakað so fantastiskt, tí hesin grunnurin stóð so nógv negativur. Eg haldi tað, at tá tílíkir pástandir koma, so er tað náttúrligt, at man fer og finnur skjølini fram og vitar, hvat stendur nú í skjølunum, tí landskassans roknskapur má verða skjøl, sum man kann líta á, sum man kann arbeiða við. Tí er tað, at tað stendur heilt greitt, at tað er eitt stórt yvirskot, sum henda núsitandi samgonga hevur yvirtikið í hesum grunni, íð hvussu so er. Tað er møguligt, at man skuldi farið longur og kannað aðrar grunnar eisini, men her er so heilt týðuligt, at her er eitt stórt yvirskot yvirtikið, tá ið undanfarna samgonga legði frá sær.

Jóngerð Purkhús (tf.) seinastu viðmerking í hesum umfarið

Nei, tað var einki yvirskot, tá henda samgonga yvirtók, tað var tað ikki. Men Anfinn Kallsberg hevði eitt roknstykki har, og eg havi ikki roknskapin hjá mær beint nú, men tað kann eg eisini hyggja nærri at, men hevði Anfinn Kallsberg lurtað eitt sindur betur eftir, tá eg var uppi, so hevði hann hoyrt tá eg segði, at tað kom eitt lógaruppskot í hesum mánaðinum tí tann gamla lógin var soleiðis, at yvirskot landskassans, sum skuldi býtast í 3, ein triðingur fór í landskassans, ein triðingur til landsverkfrøðingin og ein triðingur til endurnýggjan av skipaflotanum, men ta lógina tóku vit av tá tað fyrsta stóra yvirskotið kom í landskassanum, tað var í fjør, og gjørdu eina serliga lóg tá, og tað verður so aftur gjørt nú. Hetta lógaruppskotið má so koma eina ferð í hesum mánaðinum, helst um somu tíð, sum fíggjarlógin verður løgd fram. Nú er tað eisini tað, at

um man fer at gera upp í einum grunni soleiðis, sum vit nú hava gjørt í veðhaldsgrunninum, so kann tað gott verða ein mánað eitt ógvuliga stórt undirskot, men um tú játtar henda peningin um einar 2 mánaðir, um man hyggur aftur, tá bókingin er klár har, so er aftur eitt yvurskot, so at pengarnir eru til, tað er tað, sum tað ræður um, og teir eru innan fyri tað sama árið, so Ivan Johannesen skal ikki verða bangin fyri, at um hann kemur út í Tinganes næsta ár, so vóni eg tað, at tað verður einki undirskot í veðhaldsgrunninum.

Hilmar Kass (sj.)

Harra formaður.

Tá ið eg í gjárkvøldið lurtaði eftir tí, sum var sagt her í løgtinginum, legði eg merki til, at tá tað kom til mína røðu, var tann fyrsti parturin av henni burtur. Og tað gjørdi, at tað var ikki gjørligt at fáa samanhang í tí fyrra partinum, sum har var sagt kanska serliga um borgarligan og liberalan politikk mótvegis sosialistiskum politikki. Tað er einki at undrast á, at tað hendir av og á, slíkt óhapp, at nakað av eini talu fer burtur, men eg haldi, at tað átti at verið ein skylda tá hjá útvarpinum at sagt frá, at her er ein partur burtur, tíverri, men tað var so ikki gjørt. Tí fari eg at endurtaka nakað av tí fyrsta, ið eg segði í undanfarnu røðu míni.

Tá vit fyri skjótt 4 árum síðani vóru í samráðingum um samgongu og tað so gjørdist greitt, at tað var henda samgonga, sum nú hevur sitið, ið kom at verða skipað, tá høvdu vit púra greitt fyri eyga, at her fóru vit saman við stórum flokkum, sum høvdu sosialistiskar stevnuskráir Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, og tí varð tað skipað soleiðis, fyri at við kundu verða við í samgongu, vit kundu verða við at loysa landsins mál, á ymiskum økjum, men vit kundu ikki verða við til at fremja sosialismu. Hetta vóru hesir flokkar greiðir yvir, tað var ikki meiriluti fyri teirra stavnhaldi í løgtinginum, og teir noyddust tí at arbeiða saman við flokkum, ið kundi verða við at loysa onnur mál, sjálvt um teir ikki fingu síni mál ígjøgnum.

Úrsliti er, nú henda samgonga leggur frá sær, sum ferð efiur ferð hevur verið skírd sosialistisk reyð vinstrahall, er komin rættuliga nógv longur í móti einum borgarligum liberalum stýrislag enn tann samgonga, sum legði frá sær, sum eg sjálvur var partur í fyri skjótt 4 árum síðani. Vit kunnu spyrja, hví sjálvstýrisflokkurin tá fyri skjótt 8 árum síðani ikki syrgdi fyri, at tað vóru líberal borgarlig sjónarmið, sum vórðu framd tá, og har má eg viðganga at tað ikki kom mær í huga í eini samgongu við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, at tað skuldi verða neyðugt at treyta sær, at tað skuldi verða rikin ein borgarligur ella liberalur politikkur. Tað gjørdi at vit komu út á tann skeiva vegin, at veðhald vórðu latin, og tað var lætt at fáa

tá hugsan. Tað hevur eisini verið fært fram undur hesi samgonguni, at tað almenna skuldi standa við endan, tá ikki gekk, men tað privata skuldi eiga tá tað gekk.

Nú hevur verið sagt, at tað eru nógvir vinnulívsmenn, sum framvegis arbeiða undur fullari ábyrgd. Eg eri fullkomuliga samdur í tí, at tíbetur, hava vit nógvar vinnulívsmenn enn, sum arbeiða undir fullari ábyrgd yvir fyri sær og landi. Men, jú longur vit høvdu vaðað útí, at landið leggur seg út í uttan mun til, um tað er væl ella illa stýrt og ber uppi, jú færri høvdu hesir menn verið sum fráleið ella hesi fólk rættari sagt. Og tað er tí vert at leggja til merkis, at tað, sum henda samgonga og kanska serstakliga vit hava fingið mest oman yvir okkum fyri, tað er, at vit hava rikið ein liberalan borgarligan politik, tað er at vit ikki keypti øll farmaskipini inn í landskassan fyri 100tals av mió., sum føroyingar nú skuldu staðið til svars fyri m.a.

So tað er nógv at undrast yvir í politikki. Vit eiga nógvar góðar vinnulívsmenn enn, nógvar vinnulívsmenn, sum arbeiða við ábyrgd, men tað sum eg undrist á og tað er eingin ivi um, tá vit hyggja at veljaratølum, at nógvir av hesum velja framvegis flokkar sum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, sum grundleggjandi niðurbróta sjálvt støðið í borgarligum liberalum flokki og tá má eg viðganga, at Fólkaflokkurin er verri.

Tað hevur verið nevnt við tað ov nógva arbeiðið, sum her er og tað er púra givið, at tað er eitt tað størsta vandamál, vit hava fyri framman, tað er hetta ov nógva arbeiðið. Tað kann tykast lætt at vit fáa nakað av útlendingum inn, tá ið ástandur, men soleiðis sum málið er vorðið nú, at tað er ein stórur partur av tí fólki, sum hevur arbeitt á flakavirkjunum í summar, er útlendingar ja, ein partur av okkara fiskimonnum umborð á skipum eisini eru útlendingar, tá er vandi á ferð, av ymsum grundum. Øll lond vita, at ov nógvir útlendingar í einum samfelag avskepla samfelagið meira ella minni. Og í einum so lítlum samfelagi sum okkara, er tað enn skjótari til, at tað kann verða vandi á ferð. Einstakir útlendingar eru eingin vandi, tað er náttúrligt, tí tað eiga vit fyri so vítt at gleðast um, at teir kunna koma til landið, men ov nógvir kunnu gera vanda. Og tá má á ein ella annan hátt skipast so fyri at minkað verður um tað arbeiðið, sum fer fram.

Tað verður neyðugt soleiði

sum løgmaður sigur í røðuni, at toyggja nakað av teimum arbeiðum, sum liggja fyri framman hjá tí almenna. Men tað er ikki nóg mikið, um tað letur seg gera hjá einstaklingum at seta óavmarkað arbeiði og stórarbeiði í gongd serliga við tí lættheit, tað hevur verið at fingið útlendskan pening inn í landið. Eg eri ikki førur fyri at siga, um landsbankin verður førur fyri at stýra hesum, neyvan við tí lóggávu, vit hava, men har er ein uppgáva, sum sæð frá einum tjóðskaparligum fíggjarligum landssjónarmiði verður neyðugt, at vit fáa stýring á. Tá ið eg endaði síðstu røðu mína, var eg júst komin til samferðslumál og vísti á har, at í eisini hesum føri hevði Sjálvstýrisflokkurin í sínum máli á løgtingi verið sláðbrótandi.

Hetta at koma á flog við flogfari, sum vit føroyingar eiga, hevur verið eitt mál, sum hevur staðið framaliga leingi. Tað hevur verið nógv tosað um tað og tað hevur verið nógv arbeitt við tí, men nú er tað loyst. Samstundis fari eg at harmast um ein spurning innan samferðsluna og tað er busskipanin. Eg eri sannførdur um, at hon er ikki nóg væl skipað. Vit síggja, hvussu nógvir tómir ella nærum tómir bussar, ið ferðast aftur og fram á teimum somu leiðum og til somu tíðir, vit hava ikki óavmarkaða fíggjarmegi til at nýta til slika, man kundi nevnt til stuttleika, koyring, men tað er tað ikki, men tað er tað, sum tað oftast verður rópt fyri, tá tað eru einstaklingar, sum fara út við sínum bil. Har má stílast nógv betur fyri, enn tað higartil er gjørt, vit kunnu tá fyri munandi minni pening fáa eina góða samferðslu.

Eitt mál, ið nú hevur verið nevnt og sum hevur verið arbeitt nú við í fleiri undanfarin valskeið, ja, tað var av teimum størstu málum í mínum fyrsta valskeiði her á løgtingi umleið 1970 ella undan 1970, tað var landbúnaðarmál. Her var so eitt uppskot komið í løgtingið og eg má siga, at soleiðis, sum tað var orðað, tá tað kom niðan higar, tá kundi eg ikki taka undir við tí og eg var eitt sindur bilsin, tá eg hoyrdi Eyðun Viderø tosa um hetta mál, tí vit vóru fyri so vítt samdir um tað, sum vit ikki kundu taka undir við eitt nú at tey smærru brúkini skuldu leggjast saman soleiðis, at tey skuldu enda í nøkrum heilt stórum brúkum. Vit vóru samdir um, at tað var ikki til gagns fyri landið og enn minni fyri smábygdirnar, sum tá heilt komu tvørt fyri. Men hetta var

broytt áðrenn, lógin kom til endaliga viðgerð, so hatta kundi ikki verða orsøkin. Annað var, at ognarjørð nú skuldi kunna keypast og hava vit fyrst sagt, at hon skal kunna keypast uttan nakað, so er skjótt serstakliga, um sosialistiskt stýri kom, at so var lítið annað eftir enn jørðin hjá tí almenna, tað hevði eg hildið verið sera óheppið, tí hyggja vit at teimum landbúnaðarvørum, har vit um ikki kappingafør so nøkurlunda kunnu verða við í kappingarføri, tað vil siga mjólkaframleiðslu, so eru vit vít kunnu gott siga á máli. Tað kann verða tíðarskeið í árínum, hvar tað er í minna lagi, men aðrar tíðir kann tað eisini verða í meira lagi. Tann týdningur ið ognarjørðin hevur fyri nógv serstakliga eldri fólk úti á bygdunum eigur ikki at verða undirmett. Nú veit eg ikki, um hatta vár orsøkin til, at Eyðun Viderø ikki kundi verða við, tá hetta her henda greinin í lógini fall meir sagt, sjálvt um hon er fallin, so verður lýst, men tað tíbetur er soleiðis, at sjálvt um ein lóg er lýst skeivt, so sum henda er gjørd so má tað fylgja tí, ið samtykt er. Men tað kundi kanska ikki undra ein, um Eyðun Viderø sum fólkafloksmaður var ímóti, at menn áttu ognarjørð tí tað hava vit sæð so mikið til í Dagblaðnum, at tað, at hava áhuga fyri jarðarbrúki og hava eitt sindur av jørð við síðurnar av, verður roknað sum sera mannminkandi, so skjótt kann sinnalagið broytast sinnalagi og metingin av, hvat ið hevur virðir í einum samfelag, men at vít fyrí ikki so langari tíð síðan, hvar jørðin var høvuðsálitið og høvuðsvirðingin, nú skal tað verða mannminkandi at hava áhuga fyri jørð. Tað er ein stór broyting, og eg kundi nú líka gjørt Óla Breckmann sum hevur serliga lagt stóran dent á tað...at kenni eisini nógvar fólkafloksmenn, sum hava stóran áhuga fyrí jarðarbrúki og teir skulu hava mína fulla virðing kortini.

Eitt av teimum stórmálunum, sum hevur verið til viðgerðar, eitt mál, sum Sjálvstýrisflokkurin reisti í 1975, hetta at vit skuldu fáa undurgrundina sum føroyskt sermál, hevur verið eitt av teimum torføru málunum at loysa av teimum setningum, vit settu okkum tá hetta landsstýrisskeiðið var skipað. Vit hava havt samráðingar við donsku stjórnina. Av og á hevur verið skyldað uppá heimastýrislógina men lat tað verða rimmar fast, heimastýrislógin forðar ikki fyri, at undirgrundin kann verða yvirtikin. Men í heimastýrislógin

stendur um B-mál, at fyri at tey skulu verða flutt heim undir føroyskt, okkara lóggávuvald, so er neyðugt, at tað fæst ein semja við donsku umsitingina og føroysku umsitingina. Vit føroyingar eru samdir um at undurgrundin átti at verðið flutt frá at verið B-mál til at at verðið føroyskt sermál. Men danskir politikarar eru ikki samdir í hesum soleiðis, at tað hevur ikki verið gjørligt at framt hetta verk, men legg merki til sambært heimastýrislógina eru eingir trupulleikar. Tó skal verða sagt, sum tað er púra greitt tann dagin, vit taka loysing, so ivist eg ikki í, at vit fáa avgerðarrættin á undirgrundini. Men áðrenn tað verður gjørt, meini eg, at vit eiga at umhugsa onnur stórmál, ið vit hava felags við hin partin av ríkinum. Tí er mín sannføring eins og tann hjá løgmanni, at við samráðingum skilagóðum áhaldandi samráðingum, fáa vit undrgrundina sum føroyskt sermál, sjálvt um heimastýrislógin framvegis er í gildi.

Jákup Lindenskov (jv.)

Harra formaður.

Vit tóku við búgvi, sum hóast sterkt í grundini, hevði stórar trupulleikar, og lata frá okkum búgv munandi styrkt og konsoliderað.

Soleiðis byrjar løgmaður røðu sína á ólavsøku og sigur víðari sjálvsagt eisini við trupulleikum og nógvum vandamálum komandi, men í størri frælsi í vali av møguleikum og amboðum serliga á búskaparliga økinum, og tað er munandi hugaligari at virka fyri at loysa trupulleíkar av ov nógvum arbeiði enn at laða upp í lið, sum vit komin í, av tí at einki er fyri hendurnar. Løgmaður hevur í frágreiðing síni givið eitt yvirlit yvir gongdina í samfelagnum, og dregur fram høvuðspartar av teimum málum, sum upptaka okkum øll so ella so. Vit fáa í røðuni eina heildarmynd av støðuni í samfelagnum.

Tá henda samgonga skrivaði samgonguskjalið, so var tað greitt, at tað fór at bera til at skipa hana. Hetta valskeiðið fer nú reiðiliga at halla og tað, sum samgongan setti sær fyri at framja, tað hevur í flestum førum hepnast.

Grundarlagið undir okkara tilveru er støðugt tað sama, tað er fiskivinnan og vit eru sjálvsagt á varðhaldi og ansa eftir tí, sum fer fram har í øllum liðum, og tað er her meginparturin av orku landsstýrisins støðugt verður brúktur til at vinna okkum so góðar sømdir, sum gjørligt. Vit

stendur um B-mál, at fyri at tey skulu verða flutt heim undir føroyskt, okkara lóggávuvald, so er neyðugt, at tað fæst ein semja við donsku umsitingina og føroysku umsitingina. Vit føroyingar eru samdir um at undurgrundin átti at verðið flutt frá at verið B-mál til at at verðið føroyskt sermál. Men danskir politikarar eru ikki samdir í hesum soleiðis, at tað hevur ikki verið gjørligt at framt hetta verk, men legg merki til sambært heimastýrislógina eru eingir trupulleikar. Tó skal verða sagt, sum tað er púra greitt tann dagin, vit taka loysing, so ivist eg ikki í, at vit fáa avgerðarrættin á undirgrundini. Men áðrenn tað verður gjørt, meini eg, at vit eiga at umhugsa onnur stórmál, ið vit hava felags við hin partin av ríkinum. Tí er mín sannføring eins og tann hjá løgmanni, at við samráðingum skilagóðum áhaldandi samráðingum, fáa vit undrgrundina sum føroyskt sermál, sjálvt um heimastýrislógin framvegis er í gildi.

Jákup Lindenskov (jv.)

Harra formaður.

Vit tóku við búgvi, sum hóast sterkt í grundini, hevði stórar trupulleikar, og lata frá okkum búgv munandi styrkt og konsoliderað.

Soleiðis byrjar løgmaður røðu sína á ólavsøku og sigur viðari sjálvsagt eisini við trupulleikum og nógvum vandamálum komandi, men í størri frælsi í vali av møguleikum og amboðum serliga á búskaparliga økinum, og tað er munandi hugaligari at virka fyri at loysa trupulleikar av ov nógvum arbeiði enn at laða upp í lið, sum vit komin í, av tí at eínki er fyri hendurnar. Løgmaður hevur í frágreiðing síni givið eitt yvirlit yvir gongdina í samfelagnum, og dregur fram høvuðspartar av teimum málum, sum upptaka okkum øll so ella so. Vit fáa í røðuni eina heildarmynd av støðuni í samfelagnum.

Tá hendan samgonga skrivaði samgongusskjalið, so var tað greitt, at tað fór at bera til at skipa hana. Hetta valskeiðið fer nú reiðiliga at halla og tað, sum samgongan setti sær fyri at fremja, tað hevur í flestum førum hepnast.

Grundarlagið undir okkara tilveru er støðugt tað sama, tað er fiskivinnan og vit eru sjálvsagt á varðhaldi og ansa eftir tí, sum fer fram har í øllum liðum, og tað er her meginparturin av orku landsstýrisins støðugt verður brúktur til at vinna okkum so góðar sømdir, sum gjørligt. Vi

hava trupulleikar. Tað verður støðugt lagt til brots fyri at vinna burtur úr teimum, ella at leggja á annan bógv, eisini at finna aðrar fiskihættir, tí havið er, sum vit so týðuliga hava merkt, ikki meira fritt at fara, hvør fermetur skal vinnast og verjast. Hjá føroyingunum er tað mangan tógvið at vinna dagliga breyðið. Soleiðis hevur eisini verður, vánirnar hava altíð verið skiftandi men vónirnar hava altíð verið settar til at tað fór at bera til, og tær hava vit eisini sum er. Ótrúliga nógv er hent í hesum valskeiði, samfelagið er vorðið eitt betri, og tryggari samfelag.

Tá tað her verður tikið uppaftur og uppaftur um skip, sum fóru av knóranum, so verður tað ofta sagt, at Javnaðarflokkurin longu undan valinum seinast segði frá, at tað var eitt óvanligt grundarlag, sum samgongan tá bygdi eina farmaskipaútvikling uppá, tíverri varð tað soleiðis, og tíverri hevur hetta landsstýrið eisini sæð hvat tað er at skula gjalda tað gildið. Tað kundi verið borið betri at. Og tað átti at verið lurta meira eftir, hvat ið sagt var tá.
Føroyingar hava sæð fram til, at vit sjálvir skulu umsita okkara egna land, okkara egna samfelag, og ongantíð meir enn nú siggja vit, hvussu neyðugt tað er, og ongantíð fyrr hava vit sæð og síggja, hvussu nógv fólk dagliga hevur sítt breyð í Føroyum, og ongantíð hava vit átt betur møguleika til skúling, sum til kunnleika á flestum økjum, sum nú her heima hjá okkum.

Hetta er eisini eitt úrslit av tí førda politikkinum og á hesi leið fara vit at halda fram. So kann andstøðan finnast at og gremja seg, men tað hevur ongantíð verið hildið, serliga mansligt at sáa misálit at sáa mistreysti. Margháttligt, at menn skulu gremja seg so nógv um, at tað er so nógv fyri hendurnar her hjá okkum og eisini, at vit skulu brúka fremmanda arbeiðsmegi, tí at teir flestu, sum her hava gramt seg eru snøgt teir somu, sum beinleiðis eru orsøkin til, at vit mugu flyta inn arbeiðsmegina uttan í frá um vit skulu hava alt tað arbeiðið gjørt, sum vit nú fegin vilja, og sum hetta høga ting hevur samtykt.

Vit vita nú og tað kunnu vit bara vissa okkum um við at hyggja at teimum mongu lógasamtyktum og øðrum samtyktum her á tingi, so er tað ongin flokkur, sum hevur hildið seg aftur í, at so nógv sum gjørligt skal gerast skjótast gjørligt, vit hava eisini hoyrt her í dag, hvussu menn samstundis gremja seg um, at her verður ov hart koyrt á, samstundis krevja, at

tað, sum teir nú serliga hava áhuga fyri á teirra lokala øki, ja, tað kann og má ikki bíða, hvat skal ein siga. Sjálvsagt var tað betur, um vit bíðaðu eitt sindur og at eitt og annað arbeiði varð gjørt eitt sindur seinni, so hevði kanska betri verið vorðið manga staðni hjá okkum. Men eingin hevur stundir, kapitalurin hevur sum kunnugt yvir høvur ikki stundir at bíða og tað sýnist, sum um hann stýrur okkum.

Tá vit í seinastu tingsetu samtyktu lógini um eftirlønarpensión, fingu vit sum sita í samgonguni reiðiliga skoluna.

Tað skal verða mín vón, at vit megna at byggja og tryggja henda eftirlønargrunn so dyggan, at vít ikki ov leingi skulu bíða eftir, at fólk okkara fær eina veruliga pensión. Men hetta lagið kenna vit frá fyrr, soleiðis segði afturhaldi eisini, tá vit fingu fólkpensiónina í 1959 og tá skuldi tað verða ein ólukka fyri vinnulívið, um vit fingu hesa fólkapensión, tí tað orkaði bestemt ikki at gjalda eina fólkapensión. Men Javnaðarflokkurin var kompromileysur og hann fer ongantíð at helma í, fyrr enn vit hava tryggja okkara fólki eina sosiala lóggávu eina pensiónslóggávu, sum veruliga er ein dygg pensión fyrí okkara fólk. Javnaðarflokkurin verður borganin fyri, at vit røkka hetta mál reiðiliga.

Tað er á einum samfelagsøki vit hava sæð úrslit, sum muna og sum vit kunnu verða erpnir av, og tað er samferðslan sum heild, samferðslan eftur landi samferðslubindingin eftir sjónum sum í luftini eisini. Her hevur málsetningurin verið, at vit skuldu hava búsetingarmynstrið óbroytt, og tað hevur verið til mikið gagn fyri okkara fólk. Hesin politikkur hevur eisini givið okkum hópi av møguleikum av nýskapanum, hevur givið okkum eitt væl betri og liviligari og meira fjøltáttað samfelag. Eg hugsi eisini um teir samfelagsstovnar, sum meira áttu at verið tengdir at samfelagnum sum so enn at teimum lokalu eindunum.

Vit hava nú eisini fingið eitt regluligt samband bæði út eftir og innlendis í luftini, eg hugsi her um tyrluflúgvingina, sum átti, ið hvussu so er, at førka okkum eitt sindur nærri at tí máli, at vit fara í holt við sjúkrahúsuppgávuna og soleiðis, at hon kann verða virkandi sum ein heild í samfelagnum og ikki sum nú ofta meira og minni sum ein kastibløka, tað er syndarligt at vit ikki eru komin longur, men eg vóni, at vit koma longur við hesum máli innan alt ov langa tíð.

Løgmaður hevur ofta her í tingsalinum víst á, at neyðugt

er, at vit eiga umsitingar-apparatið, um samfelagið skal virka. Í hesum valskeiði er nógv hent nettup á hesum øki, og her er eisini nógv at gera støðugt. Tað er nógv ungt fólk, sum hevur fingið møguleikar, sum tað annars mátti leita burtur fyri at fáa her heima hjá okkum, nú vit hava eitt upp aftur betri skipað umsitingar-apparat, at vit sjálvi kunnu útbúgva okkara fólk næstan á øllum økjum. Hetta er eisini tekin um menning, um framgongd, og at tað gongur á ta røttu leiðina.

Vit hava nú hoyrt fleiri av okkara landsstýrismonnum og -kvinnum, og vit hava fingið frágreiðing eisini í einstøkum førum um mangt av tí, sum er hent, sum er avrikað, og sum skjøtil er settur á.

Í samferðslumálum fingu vit at vita um eina rúgvu av tí, sum er í gerð, og sum er gjørt, somuleiðis eisini á skúlaøkinum.

Tað skal verða vón mín, at vit duga at seta út í kortið soleiðis, at hesi tingini, sum eru í gongd, og sum skulu gerast, koma at verða sum ein liður í øllum øðrum, sum skal gerast her í samfelagnum soleiðis, at okkara vinnulív ikki verður tarnað beinleiðis. Tað hevur íðuliga verið vist á, at vit mugu steðga á í hesum og hasum, men eitt hevur verið heilt týðuligt, at teir tingmenn, sum serliga hava hvest frá sær, tí at so nógv er í gongd og so stórt virksemi er, tað er nettup teir somu menninir, sum fýlast á, at ikki alt møguligt annað verður gjørt, sum nettup liggur teirra lokalu áhugamálum nærri. So ein má spyrja, hvat er tað veruliga, teir meina, hvat er tað, teir siga, er tað ikki bara fyri at siga nakað?

Eg fegnist um, at Hjálpartólamiðstøðin nú er farin at virka. Hetta mál hevur nú 10 ár á baki, tað hevur havt eina tunga føðing, og tað er so nógv annað, ein kann fegnast um.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum nevndi, at studningsmálið, SÚ-málið, nú kemur at virka frá miðjum næsta mánað, og tað er eisini at fegnast um, at okkara ungdómur fær høvi til at útbúva seg og eisini kann fáa stuðul til tað.

Mong av hesum málunum krevja jú, at vit eisini líka sum ansa eftir, at tað, sum skal koma inn í landskassan veruliga er til staðar, tá ið vit skulu gjalda út. Tí hevur tað so ómetaliga stóran týdning, at okkara vinnulív fær tær sømdir, sum tað eigur, at vit ansa okkum í øllum liðum og veruliga búgva okkum soleiðis út, at ein og hvør, tá ið hann er liðugur við útbúgving sína, kann fáa eitt arbeiði og kann hava nokk fyri hendurnar. Tað hevur verið aðalstevnan og endamálið hjá

hesari samgonguni, og tað fer eisini at verða soleiðis, hann er liðugur við útbúgving sína kann fáa eitt arbeiði og kann hava nokk fyri hendurnar, tað hevur verið aðalstevnan og endamálið hjá hesari samgonguni og tað ferð eisini at verða soleiðis framyvir.

Harra formaður, vit hava støðugt úr at gera vit seta okkum fyri at loysa teir trupulleikar, tær uppgávur, sum koma at verða fyri framman. Vit kunna siga, at saman um tikið so royndist hetta valskeiðið væl.

Eg fari at takka løgmanni fyri frágreiðing hansara, førningurin, hann nú skal seta frá sær fyri hetta valskeiðið, hann royndist.

Sverre Midjord (jv.)

Harra formaður.

Tað er sum sagt løgmansrøðan, sum verður viðgjørd, og við tað, at eg ein part av hesum skeiðnum havi umsitið skattamál, so fari eg at nevna eitt sindur um skattamál og serliga um tað so kallaða P-talið ið varð gjørt øgiliga nógv burtur úr serliga av Fólkaflokkinum, har ið Fólkaflokkurin undir valstríðnum til Fólkatingsvalið 2 ferðir koyrdi øgiliga hart fram, at tað var hetta stýrið, sum nú hevði givið myndugleikunum møguleikar at fara inn á hvørja bankabók og hvørja konto og avkontrollera hvønn einstakan. Har hava teir gingið so langt, at teir søgdu, at ein og hvør politikari kundi kontrollera, hvat ein annar tjenti, tað er ikki so.

Hetta stýrið bara gjørdi ta skipan, sun varð framd í 1962 av sjálvstýrislandsstýrinum, sum gjørdi ognaruppgerðina, liðiligari í samband við, at vit fingu eina aðra skattaskipan. Eftir tí gomlu skipanini frá 1962 hava myndugleikarnir loyvi til at kanna hvørja einasta konto hjá hvørjum einstøkum borgara í Føroyum, og tað má verða rímiligt, tí teir, sum viðgera skattamál hava tagnarskyldu tað er púra klárt. Er tað veruliga so, at persónar, sum hava umsitið hesi mál fyri almenningin og fyri privatar hava latið verða við at uppgeva ognaruppgerðina, sum er grundarlagið undir búskaparligu kanningini her á landi? Um teir, sum fylla skjøl út fyri fólk hava útilatið hetta her, so hava teir gjørt seg skyldugar í skattamutri. Men tað er væl ikki so. Skattaviðurskiftini í Føroyum eru broytt, men alt er ikki greitt enn, tað má skipast so fyri á skattaøkinum, at skattastigin verður broyttur, og at skattatrýstið minkar, tað er hægt. Hetta merkist mest hjá lágirntøkunum, og her má ein

broyting henda.

Tað er ein spurnigur, um ikki ein komandi lønarsamráðing um hægri lønir eigur at takast við undir skatta og tollviðurskiftunum, tí tað vísir seg hvørja einastu ferð, ið lønarhækkingar fara fram serliga hjá láginntøkuni, so verður beinanvegin skattatrýstið hægri og harvið verður tikið inn aftur ofta meira enn tað, ið tann láglønti fekk í lønarviðbót. Somuleiðis má eisini hugsast um, at við ov stórum lønarhækkingum her á landi við bara tí einu framleiðsluni, vit hava av fiski, so hendir tað, at vit kunnu ikki verða kappingarfør. Vit mugu í staðin fyri lønarhækking fara alvorligt út í eina diskussión, um vit ikki ístaðin fyri lønarhækkingina skulu geva komensatión í skatta- og toll-viðurskiftunum fyri tey lágløntu. Tí sannleikin er tann, at framleiðslan í Føroyum kann ikki bera hesar byrðarnar, sum allir løgtingslimirnir, allir samlir uttan undantak eru við til at samtykkja her á landi. Skatturin er ov høgur og lønarlagið er ov høgt. Vit hava bara eina rávøru, vit framleiða enn flak, sum vit senda út sum rávøru og vit mugu eisini ofra nakað av pengum upp á tað at foredla hesa rávøruna soleiðis, at vit kunnu fáa meira fyri minni fisk, tað er tann gongda leiðin. Tað undrar meg øgiliga nógv, tá man her í dag hevur diskutera, svartkjaftaviðurskiftini, at man ikki eisini hevur diskutera hvat vit kunnu gera við tær minkandi fiskamongdirnar. Vit kunnu ikki bara halda á fram at tøma havið fyri fisk og so koyra helvtina í havið aftur sum oyðilagdur fiskur ístaðin fyri minni fiskimongdir, stytri fiskitíð betri fiskaprisir og framleiða teir liðugar, tað má verða framtíðin hjá okkum føroyingum, um tað skal verða livandi her á landi. Nú var svartkjaftavirnan nevnd í gjár, og landsstýrið hevur fingið nógvan ágang fyri svartkjafta teir kallaðu tað fyri ævintýrið, tað geri eg ikki, tí um tað er eitt ævintýr, so byrjaði ævintýrið undir tí fyrra landsstýrinum við einum skjali, sum kom niðan frá landsstýrinum og eg haldi, at eg taki ikki feil, at tað var undirskrivað av Olaf Olsen og fyrrverandi løgmanni Paula Ellefsen, har teir tilráddi, til at man fór meira út í svartkjaftavirnuna.

Eg haldi, eitt tað fyrsta svartkjaftaskipið, sum kom til Føroyar, var "Giljanes" tað var ein roynd, og teir menn sum gera royndir vita at tað kostar. Væl var tað so, at tá "Giljanes" kom, kostaði

hann umleið 25 mió.kr. og tá hann fór av knóranum, var hann komin væl uppí tey 80, hvør so kann finna út av tí, men í øllum førum, hevur tað eisini kostað nakað at eksperimentera.

Tað næsta svartkjaftaskipið, sum kom var "Reynsatindur". Eg havi so ofta sagt tað her, og eg kann endurtaka tað, at útvarpið var umborð á Reynsatindi, hetta var eitt av teimum størstu skipunum í heiminum av sínum slagi, og føroyingar høvdu keypt tað, teir sum áttu tað, fingu tað ikki at ganga og so var útvarpið umborð og hevði samrøðu við skiparan og spurdi, hvat grundarlag var undir hesum skipinum, einki segði hann, einki hetta var undur ti borgarliga stýrinum, sum vit høvdu. Tað var einki grundarlag undir skipinum uttan so, endurtók skiparin, at vit fáa rækjuloyvi við Svalbard.

Ja, Anfinn Kalsberg ristur við høvdinum, men hann kann fara niðan í útvarpið og biða teir spæla bandið av, ti teir hava tað ivaleyst har uppí.

Teir fingu rækjuloyvi, teir fingu eisini rækjumaskinur frá landinum settar umborð, Anfinn kann rættleiða meg, um tað er skeivt, men tað er ikki skeivt, tað var einki grundarlag undir tí og tá byrjaði svartkjaftaævintýrið, um tað verður kallað soleiðis.

Tað er ikki hetta landsstýrið, men tað hevur hildi áfram at roynt at funnið útav, um man kann fáa nakað burtur úr svartkjaftinum. Eitt annað er tað, at svartkjafturin hevur eisini verið grundarlagið undir teimum fiskivinnusamráðingum og teimum fiskivinnusáttmálum, sum eingin løgtingsmaður vil trá...har hava vit avreitt svartkjaft fyri at fáa annan fisk, tað er jú veruleikin.

Oljutollurin var nógv umrøddur í sínari tíð, har ið serliga Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin við koyrdu uppá, at nú píndu sosialistarnir øll tey gomlu og tey sjúku og rætt var tað, at oljutollurin varð lagdur á, men beinavegin, ið tað var uppspart ein munandi nøgd av pengum, so lógu teir framvið aftur hesir somu menninir, sum beint framan undan høvdu sagt, at nú píndu vit samfelagið eftir meira pengum tá vóru teir fremstir at forlanga, at nú skuldu teir hava part av hesum pengunum, men teir eru tíbetur bundnir í oblikatiónum, so at teir pengarnir eru tøkir, tað er væl munurin.

Global hevur eisini verið umrøtt her í dag. Tað er kanska ikki eitt so populert mál at umrøða, men Asbjørn Joensen las eitt uppskot, sum hevði verið

tað sum Pauli Ellefsen fyrrverandi løgmaður, leiðari av Sambandsflokkinum í Føroyum, um tít skulu hava alt við.

Eg las eina grein nú fyri stuttum, har ið fyrrverandi Ríkisumboðsmaðurin í Føroyum Niels Bentsen ger upp um valúrslitið til heystar, og har dregur sjálvandi triggjar av leiðarinum fram, Paula Ellefsen, núverandi fólkatingslim, statsvirðurkendur grannskoðari, løgtingsmaður, Jógvan Sundstein, statsgóðkendur grannskoðari og løgtingsmaður og Atla Dam, løgmann,

Úrslitið av valinum verður, hvussu ið hvør einstakur løgtingslimur hevur roynst sínum valdømi. Tað hevur hann fyri so vítt rætt í, at tað einstaka valdømið er jú avgerandi, tí tað er býtt upp í valdømi, hvussu ið hetta fer at roynast. So kann ein gera upp, hvussu henda tíðin hevur roynst okkum í Suðuroynni. Man skal ongantíð vera nøgdur sum politikari, tí ert tú nøgdur sum politikari, so skalt tú halda uppat. Man skal ongantíð vera nøgdur. Men vit kunnu ið hvussu er verða eitt sindur nøgdir, tí eitt kom so av skafti.

Tað byrjaði við, at bergholið til Sumbiar varð gjørt, sjálvt um mín góði vinur Eilif Samuelsen hevði so mógv at finnast at, tí sumbingar høvdu jú veg, segði hann, men gásadalsmenn høvdu ongan veg. Men tey høvdu heldur ongan veg frá 1980-1984, tá var heldur ikki annað enn gangandi til Gásadals, og tá var sum sagt, onkur hevur nevnt tað, eg haldi tað var Hergeir Nielsen, bert 5 mi.kr. um árið avsett til bergholsgerð.

At bergholið til Sumbiar er komið er at frøast yvir. Tað næsta tiltakið, sum er at frøast yvir fyri Suðuroynni viðvíkjandi er, at sjúkrahúsviðurskiftini eru komin í rættlag. At vit fáa útbygt sjúkrahúsið soleiðis, at vit, sum búgva í Suðuroynni í framtíðini, kunnu føla okkum trygg. Eg havi sagt tað fyrr, tað hjálpur ikki at fáa tyrlur ella fleiri skip siglandi, tað betir ikki um hjá sjúklinginum, hann má hava trygg viðurskiftir í oynni.

Eg eri fyri so vítt nøgdur við tað mesta, sum er farið fram her í hesi 4 árini. Men í skattanevndini fara vit at taka okkum álvarsliga av viðurskiftunum hjá láginntøkunum, tað vil siga skattastiganum og sum eg eisini byrjaði við at kanna møguleikarnar, um man ikki kann finna eina gongda leið við í staðin fyri lønarábót at taka tað yvir skattin og tollin, tí eg tori eg at standa fast við, at hetta samfelagið kann ikki í framtíðini halda á fram við bert at økja um lønirnar, tí økt løn skapar økt skattatrýst og økt løn ger tað, at vit ikki í framtíðini verða so kappingarfør, sum vit skulu verða fyri at kunna liva her á hesum klettum.

Sannleikin er tann, at einki samfelag í heiminum hevur tað so gott sum føroyingar og tað kann ikki verða meiningin, at vit á luksus klassa skulu koyra okkum sjálvi í avgrundina. Takk fyri

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Nú var aftur notat um svartkjaft frammi. Tað er rætt, at tað fyriliggur eitt notat frá 1981, ella nær tað var, sum Olaf Olsen og eg skrivaðu undir, og hetta var eitt veldugt notat við visiónum væl at merkja út frá vónum, sum vit og aðrir høvdu til svartkjaftin tá. Notatið visti nevnliga, hvat ein kundi hugsað sær at gjørt, um tað gekk so væl við svartkjaftinum, sum vit roknaðu við og sum vit ynkstu. Vit skuldu hava virkir á landi, vit skuldu havt skip í veiðu og so víðari. Men royndirnar gingu tíverri ikki so væl, sum vit ætlaðu og ynkstu, og tí bleiv bert tann eina íløgan framd undir okkara landsstýri nevniliga eitt skip.

Har aftur í móti søgdu vit kortanei til tey virkir í Kollafirði og Gøtu, sum javnaðarflokkurin ynksti, tí vit søgdu, at grundarlagið var ov vánaligt. Og eg skilji á fleiri samgongumonnum ikki bert Sverra Midjord men á fleiri, at tað einasta grundarlagið undir hesi investeringini, sum nú er framd upp á einar 600 mió.kr., er eitt notat, sum er gjørt í 1981 úti í Tinganesi, eitt notat, sum var vorðið óaktuelt langt áðrenn, vit løgdu frá okkum og tá ið nú hetta svartkjaftaævintýrið ella sorgarleikurin, tað kann gera tað sama, hvat man kallar tað, er farin fram nú hesi seinastu 3-4 árini, so hevur Sambandsflokkurin als ikki tikið undir.

Tað er als ikki tað, at eg ikki vil viðganga, at eg undirskrivaði notatið tá, men tíðirnar hava vist, at tað var ikki rætt tað, sum vit roknaðu við í notatinum, og tí vildu vit ikki verða við til íløgur, meðan vit sótu, og vit vildu heldur ikki verða við til tær íløgurnar, sum nú liggja spjaddar runt inni á Skálafjørðinum sum ein skomm fyri ikki bara hesa samgonguna og hetta landsstýrið, men sum ein skomm fyri landið.

Sverri Midjord (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Til Paula Ellefsen løgtingsmann skal eg siga, at tað var ikki notatið, sum var grundarlagið, men nú segði Pauli Ellefsen sjálvur, at tað var áktuelt í 1982 eg meti, at tann samgongan, sum sat tá, var longu óaktuel, áðrenn hon startaði.

Aðolf V. Hansen (fr.)

Harra formaður.

Nú var Pauli Ellefsen her,

og hann tosaði um skommir, sum lógu á Skálafjørðinum. Nú veit eg ikki um hann meinar við virkið hjá partamarni hansara, sum er við at koma upp á internationalan plan nevnliga hetta at gera svartkjaftatablettir, sum sær út til at verða ein heimssuccess, um ein kann siga so líka sum Palmólive og ymisk tannkrem o.s.f. eru vorðin, tað og man kann rokna við, at inni á Toftum verða tað fleiri millionerar, milliarderar burtur úr hesum vidundurtablettum sum virkuliga eru tað sum tær eru uppreklameraðar til at verða. Um tað er tað, ið Pauli Ellefsen meinar við virkir, sum man skal skammast yvir, ið liggja har inni veit eg ikki.

Annars ætlaði eg, harra formaður, at koma við einí lítlari viðmerking til Ivan Johannesen, áðrenn eg byrji mítt innlegg.

Tað var soleiðis, at eg endaði mína fyrru røðu við at gleðast, um at lógin aftur var galdandi og tað gekk lógliga fyri seg í Tinganes, ið hvussu so er, á einum ávísum kontóri. Ivan kemur upp og tað er væl skiljandi, at hann kemur spyrjandi, hvat er hetta her, kanska veit hann ov lítið, men eg vil bert siga við Ivan Johannesen, at eg vil hava loyvi til at gleðast yvir, at ólógligheitir á ávísari skrivstovu í landsstýrinum hildu uppat, tá Karolina Petersen gjørdist landstýrismaður. Hetta vil eg hava loyvi til uttan at verða lagdur undir slatur og útspilling av Ivan Johannesen.

Ivan Johannesen kann verða heilt sannførdur um, at hann fær øll tey skjøl, sum neyðug eru til at lýsa málið heilt í botn. Tað álit havi eg á teirri nevnd, sum hevur hesar kanningar um hendi. Pauli Ellefsen var her og hann segði faktiskt frá essensinum í tí viðagitna notatinum. Nú verði eg tann triða á rað, sum komi at tosa um notatið og eg komi eisini at tosa um tað her ikki í nøkrum negativum týdningi meir í einum positivum týdningi.

Eg nevndi í míni fyrru røðu, at um tað ódámliga í at høgt verður eftir teimum, sum gjørt høvdu íløgur í svartkjaftaskip og eftir teimum mynduleikum, sum høvdu loyvt hesum íløgum. Eg vísti eisini á, at hugurin at gera íløgur í stór svartkjaftaskip varð stimbraður av fyrrverandi løgmanni Paula Ellefsen og fyrrverandi fiskimálaráðharra Olaf Olsen við einum rúgvísmiklum notati um hvussu vit kunnu fáa eina milliard burtur úr tí svartkjafti, sum svam rundan um okkum. Eg vil beinanvegin

skoyta uppí, at fortreytirnar bara batnaðu aftan á, notatið kom fram. Hetta notatið er helst skrivað og útsent í bestu meining og í vón um, at íløgur fóru at verða gjørdar. Einki ilt frá mær um, at notatið varð útsent og einki ilt um teir, sum gjørdu íløgur, stimbraðir av notati Paula Ellefsen og Olaf Olsen. Men tað, sum eg haldi vera tað ódámliga er, at teir flokkar, sum umboðaðir av Paula Ellefsen og Olaf Olsen sendu út notatið, nú nýta fruktina av notatinum sum runubløk eftir teimum sum trúðu upp á notatið og eftir teimum játtandi instansunum, tað verður seg landsstýrið ella lánistovnar.

Ein lívsins grundregla er, at skal nakað vaksa, so má nakað doyggja fyrst, hugsið um sáðkornið ella um okkara vælkendu setepli, tey doyggja, men nakað nýtt veksur upp, hesum lívsprincippi harra formaður, sleppa vit ikki undan. Fruktin av notatinum er sett niður og deyð. Vit eiga tí at vóna at nýggjar fruktir yaksa fram og tað í fleir foldum.

Í míni fyrru røðu segði eg frá, at eg sá nakað gott og nakað stórt og nakað meira í tí svartkjafti, sum svimur rundan um okkum. Føroyska náttúruríkidømið er avmarka til tað, sum fáast kann úr havinum, vit eiga tí at læra at fáa sum mest burtur úr hesum náttúruríkidømi Allir flokkar eiga at samarbeiða um at fáa sum mest og best burtur úr okkara avmarkaða náttúruríkidømi, hetta vil verða betur fyri okkara lítla samfelag, enn at kappast um at speireka tey, ið hava hug at royna at fáa nakað burtur úr. Vit hava gjørt roynðir við framleiðslu til beinleiðis útflutning og hevur hetta miseydnast sum heild, tó so at onkur minni hjáframleiðsla sær út til at hava eydnast. Vit eiga nú at seta høvur í blot og hugsa í øðrum bana. Tann beinleiðis útflutningurin er miseydnaður, tað er tí nærliggjandi at hugsa, finnist nøkur framleiðsla til óbeinleiðis útflutnings? Kunnu vit burtur úr svartkjaftinum gera eina góðsking beinleiðis ella óbeinleiðis sleiðis, at henda vinna gerst lønandi? Og eftir minum tykki, so vil eg siga ja, tí hjá mær er lítið at liva av. Svartkjaftur er stórsta proteinríkidømið, sum til er. Vit innflyta stórar nøgdir av fóðuri, bæði til landbúnað, til alivinnu og til pelsdjóravinnu. Og ein kann so spyrja, hví ikki foredla svartkjaftin til laks, til síl, til skinn til útflutning ella til eitt hvørt virði.

Alivinnan er komin í hæddina og skal nú bert stabilisera seg

til at verða ein tryggur, stórur útflutningur. Har aftur í móti er lítið gjørt við pelsdjóravinnuna. Bert ein minkafarmur er í landinum, og hann arbeiðir undir ótolandi trongum umstøðum bæði umhvørvisliga og fíggjarliga, men hann liggur har í Rituvík sum eitt prógv um, at eisini á tí økinum eru møguleikar bert, vit frá politiskari síðu vilja gera tað, ið neyðugt er fyri at gera livilíkindir til eina tílíka vinnugrein. Og eg meti eisini at vit eiga at eggja fólki til at fara undir tílíka vinnu sum t.d. pelsdjóravinnuna, tí sum sagt størsti reservi í ríkidømi, ið vit hava, vita vit, at tað er bara tað eina, og tað er svartkjafturin og tí mugu og skulu vit fáa nakað burtur úr svartkjaftinum, tað mugu allir 32 tingmenninir verða samdir um, um vit skulu hava nakað burtur úr, og so kunnu vit kasta við runubløkum eftir hvørjum øðrum um, at, ja, men also hetta her gekk also ikki o.s.f. Tað er nú einaferð tíbetur ikki fortíðini, vit skulu liva av, vit skulu byggja á fortíðina og byggja á tær royndir, sum har eru gjørdar, um tær eru ringar ella góðar, men vit skulu liva av sjálvari framtíðini og framtíð okkara skal ikki koma í vanda, so er neyðugt at foredla svartkjaftin, um man kann brúka orðið foredla, tá tað gongur frá einum produkti til eitt annað, men foredla svartkjaftin til tey dýrastu skinnini til hesar finu parisardamurnar og londondamurnar, sum vilja keypa tað fyri nógvar pengar. Ja, nú skal tað ikki verða ein diskriminering av kvinnum, men tað er nú einaferð mest, kvinnurnar sum brúka pelsar, og tí eiga vit allir at taka saman hendur og finna út av, hvat vit kunnu gera.

Eg vildi ynskt, at í Sambandsflokkinum vóru bara menn sum Jógvan Olsen, ið veruliga hevur roynt at gjørt nakað við hetta uttan at kasta eftir øðrum fyri teirra miseydnaðu royndir.

Hetta er so nøkur av teimum málum, sum Framsóknarflokkurin vil arbeiða fyri. Flokkurin hevur hesa stuttu tíð, hann hevur fingið loyvi at verða v í landsins stýri, prógvað seg, sum dugnaligan í verki.

Takk fyri harra formaður.

Pauli Ellefsen (sb.) eina viðmerking

Harra formaður.

Eg skilji væl myndina hjá Adolfi um náttúrunnar gongd, har sáðkornið doyr í samband við at fruktin kemur fram, me

tað er ein spurningur um Adolf ikki trekkjir ov stórar vekslar upp á náttúruna, tá hann sigur frá, at henda samgonga hevur grivið eitt fýra ára gamalt notat niður og tað doyr, sigur Adolf og fruktirnar eru, eg veit ikki, hvussu nógvir hundrað millióna tals svartkjaftabátar, sum liggja og flóta inni á Skálafjørðinum. Hatta er ikki náttúrligt, tað vil eg standa fast uppá, og um okkara atfinningar og útviklingin í svartkjaftavinnini, vil eg siga tað, at landsstýrið undan okkum innflutti tvey skip, læt okkum siga, at tey kostaðu 100 mió.kr. Vit gjørdu tað í fýra ár eisini aftaná, at hetta notatið var komið fram. Vit loyvdu einum skípi inn, læt okkum siga, at tað kostaði 60 mió.kr. og royndirnar søgdu tað inntil 1985, at vit kundu ikki innvestera meira, vit máttu gera fleiri royndir vit kundu ikki investera. Hetta landsstýrið hevur investerað millum 600 og 700 mió.kr. í nýggj svartkjaftaskip, sum royndirnar ikki góvu grundarlag fyri, tað er tað sum er at kritisera.

Adolf V. Hansen (fr.) viðmerking

Harra formaður.

Eina lítla áheitan til mín góða javnaldra og vinmann, royn at verða skilagóður og ikki bara træta. Notatið var tøðið, tað var bara tøðið í veltuni, eplið er tey skipini, sum farin eru tey virkini sum farin eru. Tað er av royndunum av teimum, vit skulu byggja víðari og fáa góða og nógva frukt úr, og vit eru so heppin, at tvey av skipunum ella kanska trý liggja her í millum oyggjarnar enn, so tað er kanska møguleiki at brúka tey í tí nýggja umganginum, sum vit skulu gera við svartkjaftinum. Tað verður avgjørt neyðugt, at vit gera nakað á hasum økinum, og eg skal siga júst sum er, at tað harmar meg ómetaliga nógv, at hesi skip eru steðgað. Eg meini, at vit skulu einki leggja í, um vit høvdu brúkt nakrar milliónir í tað aftrat so tætt var tað við at eydnast.

Eg skal verða fyrstur at siga, at vit kunnu kanska takka júst Paula Ellefsen og Olafi Olsen fyri, at hetta arbeiði kom í gongd, tí teir komu hóast alt við notatinum, um eg so má siga.

Karin Kjølbro (tf.)

Harra formaður.

Áðrenn komið verður til tað, ið var eftir av tíð, eg hevði upp á hjartað, so var tað ein lítil viðmerking til ein andstøðupolitikara, ið fór at

tosa um almenna skrivstovuveldið, um tað skuldi verða eitt alternativ til fiskivinnuna.

Tað hevur nú í mong ár verið soleiðis, at tey almennt løntu hava verið sjúk børn hjá politikkarunum, altíð eru viðgjørd niðursetandi og á ein keðiligan hátt, og vit siggja, at avleiðingarnar eru, at tað er ein støðug fráfaring frá almenna sektorinum yvir í tann privata sektorin. Vit siggja tað allastaðni, tað er nærum ógjørligt eitt nú at finna ein jurist, sum arbeiðir í almennu umsitingíni, teir fara allir út í fría vinnu og vit siggja, at so nógvu skrivstovufólk fer eisini.

Vit sóu fyri stuttum, at sjúkrasystraskúli Føroya gjørdi vart við, at trý pláss vóru leys til heystar á sjúkrasystraskúlanum. Um onkur helt seg verða skikkaðan, so vóru tey vælkomin at søkja. Hetta er eisini nakað nýtt at áhugin at fara inn á sjúkrasystraskúla er so lítil. Tá hugsað verður um Føroya læraraskúla, so visir tað seg á sama hátt, at tilgongdin er lítil.

Tað, sum eg vil síga, er, annars, at tá vit samtyktu blokkstuðulsskipanina, endaðu vit eftir áheitan frá løgtingsins almennu heilsunevnd, at tað skuldi gerast nakað til tess at gera arbeiðið meiningsfyltari hjá teimum, sum arbeiddu á almannastovuni, at geva teimum eina kenslu av, at tey høvdu ein størri førleika, at tað skuldi leggjast nakað munagott í skeiðvirksemi og eftirútbúgving hjá hesum fólki. Eirki er hent á hesum økinum, hetta fari eg at minna á, og harumframt at minna á, at vit skulu verða góð við tey almennt løntu. At enda standa vit púra einsamøll og eingin vil verða har og tað er líka so álvarsamt sum tað, at fiskivinnan ikki fungerar, at tey fólkini, sum hava førleika og dunasemi ríma, tí vit ikki eru nóg góð við tey.

Harra formaður. Tað var almanna-og arbeiðaramál, ið vóru eftir hjá mær at nevna. Tað var longu í sekstiárunum, at tingmenn vóru greiðir yvir, at fólkapensiónin var ov lág, tað er tí at fegnast um, at støðan um síðir er broytt og vit fáa eina arbeiðsmarknaðarpensión. Eftir uppskoti landsstýrisins skuldi talan verða um eina pensión, ið var eins stór og fólkapensiónin, tá hon kom at virka til fulnar.

Hóast tað ikki gjørdist soleiðis, so hevur lógin um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðar pensión bøtt munandi um støðuna.

Sum kunnugt, harra formaður, so skal hetta tambast út yvir eina longri tíð, tá gjaldast

skal inn í grunnin og procent-parturin verður ikki 3 men 2, og hetta var prísurín fyri hesa samgongu, tað mugu vit so liva við. Ætlanin var, at tað skuldi verða ein arbeiðsmarknaðarpensión, ið var eins stór og fólkapensiónin men so skuldi ikki verða.

Ætlanír landsstýrisins nú um at tryggja fólka-og avlamispensionistum meira burtur úr arbeiðsinntøkuni er eitt heppið tiltak, sum vit fara at takka okkara nýggju landsstýriskonu fyri, og vit gita, at hetta fer at lætta um gerandisdagin hjá pensionistum. Harumframt er at siga, at hetta er eitt sera heppið tiltak í eini tíð, hvar ið okkum tørvar arbeiðsmegi í landinum, hvar vit innflyta arbeiðsorku, so kunnu pensionistar verða til mikla hjálp.

Undir kommunumálum sigur landsstýrið, at tey vilja skapa flakavirkjum betri arbeiðskor soleiðis, at fólkið ikki fer í aðra vinnu, og tí skal virksemið á øðrum økjum tálmast. Júst tí, vit flyta inn arbeiðsmegi, er vert at umhugsa, um tað ikki var ódýrari og betri at kanna, um ikki fleiri kvinnur í Føroyum fegnar vildu út á arbeiðsmarknaðin um tryggir barnaansingarmøguleikar vóru. Her er á ongan hátt ætlað at reka kvinnur út á arbeiðsmarknaðin, sum ikki ynskja tað, tað er ikki tað, tað snýr seg um, men meira og meira frættist frá kvinnum bæði í Havn og kring landið, at tær fegnar vilja út at arbeiða, men at tað ikki letur seg gera vegna tvørrandi barnaansing. Eg ivist ikki í, at her liggur ein ótroyttur møguleiki. Hetta skuldi verið ein sjálvsøgd samfelagsuppgáva eins og ein rættur hjá kvinnunum og okkara børnum.

Eg fari annars at nýta høvi til at biðja landsstýrið at umhugsa at leggja fram aftur uppskotið um javnstøðislógina, áðrenn valið.

Valla ivast nakar í, at tíðin arbeiðir við kvinnunum, og politikarar mugu gera sær greitt, at vit ikki kunnu lata sum einki við tí tilfeingi, við teimum resorcum, sum kvinnurnar umboða.

Harra formaður. Eg fari at nýta høvi til at citera nýliga deyðu Elsu Gress, danska skaldið og avangardistin, tá hon sigur" Kvinner skal selv huske at bruge sin intelligens og sine følelser, gør de ikke det, vil andre vide at gøre det". Harra formaður. Henda samgonga hevur verið heppin í nógvar mátar, og valla er veljarin í iva um, at hetta var frægasta samgonga, ið smíðast kundi aftan á seinasta valið. Eyðvitað er nakað at seta fingurin á, men her kunnu vit ugga okkum við, at støðan uttan iva hevði verið munandi verri, um ikki júst henda samgonga var gjørd.

Harra formaður. Sólin skínur og alt sær so fagurt út her frá tingsins røðarapalli, og vit hyggja útum, øll hava vit ein dreym. Martin Luther King talaði um dreymin um frælsi fyrí svarta fólkið í Amerika. Í ár eru hundrað ár liðin síðan, føroyski dreymurin um frælsi kyknaði upp, tá fundurin skuldí verða inni her á løgtingi 2. jólakvøld. Tað eru hundrað ár síðan, og tað eru 40 ár síðani, Tjóðveldisflokkurin orðaði gongdina og leiðina fyri føroyska tjóðveldinum.

Harra formaður. Eg skilji, at hetta er seinasta almenna orðaskiftið í hesum valskeiði, og fari eg at nýta høvið til at takka fyrí meg. Dreymurin er hin sami nú, sum tá eg byrjaði her fyri 10 árum síðani Frælsar Føroyar, har vit sjálvi gjalda og har vit sjálvi valda.

Lasse Klein (sj.)

Harra formaður.

Í mínum fyrsta uppleggi umrøddi eg samferðsluspurningar og boðaði frá, at eg í mínum næsta umfari fór at umrøða mentamálini, sum eisini hoyra undir málsøki sjálvstýrisflokksins.

Tey tykjast annars ikki hava fingið nakra serliga umrøðu higartil, men eg fór at ugga meg við, at tað kanska fór at koma, men nú er tíðin liðin so langt út, so at tað sær dapurt út fyri nakrari serligari umrøðu. Tað er eingin sum helst ivi um, at leiklistin í Føroyum hevur havt trong kor at arbeiða undir tey seinastu mongu árini, men hinvegin kann ikki sigast tað sama um karmarnar um sjálva leíklistina, nevnliga tey mongu bygda og ungdómshúsini umframt sjónleikarhúsini, sum komin eru síðan henda lóg kom í gildi í Føroyum. Studningurín til ungdóms-og bygdahúsini er í løtir 30% av kostnaðinum, meðan studningurin til pall ljóð og ljós hevur verið 50%. Nú er so atlan frammi um at seta á stovn ein sokallaðan sjálvognarstovn, sum fær heitið Leikpallur Føroya, sum skal hava til endamáls at menna leiklístina upp aftur meira og at verða ráðgevi hjá landsstýrinum, tá tað snýr seg um bygda-og ungdómshús, sjónleikarhús og leiklistina sum heild.

Talan er ikki um at byggja ella reka eitt tjóðleikhús í Føroyum, tey hava vit sum kunnugt mong av, men at samskipa leikpallafeløg og ikki minst tey unleið 1000-1500 fólkini, sum fáast við leiklist runt um í landinum, at veita teimum ráðgeving við at seta leikir upp, hjálpa til við pallmyndum, umsetingum av

leikum og so framvegis, somuleiðis at vegleiða og ráðgeva bygda-og ungdómshúsum. Tann peningur, sum á hvørjum ári verður avsettur til leiklistina, er ætlanin at Leikpallur Føroya skal umsita, men neyðugt verður at hækka hesa upphædd, um henda ætlan skal eydnast. Hesar ætlanir, sum her er talan um, eru gjørdar í tættum samarbeiði við MÁF, sum nú í nøkur ár hevur gjørt eitt fyrimyndarligt arbeiði leiklistini at frama.

Sum kunnugt um ikki so langa tíð fer útvarpið at fáa 200 kilowatt millumbylgjusendaran, sum arbeitt hevur verið við nú í nøkur ár. Tá verða líkindir at gera sendingar til sjófólkið og føroyingar, sum eru burturstaddir og við hesum sendaranum verða líkindi at gera sendingar til útlond, sum viðgera føroysk málsøki og spurningar. Eisini verða líkindini betri til at andøva móti tí fremmanda mentunnar ágangi, sum vít kunna vænta okkum frá sendingum, sum sendar verða um satolitstøðir. Ein viðkan av senditíðini hjá útvarpinum er eyðsæð eins og tað man verða lítil ivi um, at tað summar partar av samdøgninum fer at verða sent á tveimum rásum. Útvarpsleiðslan er farin undir at fyrireika stovnin til hesa avbjóðing og ætlanir eru frammi um eina minni uppíbygging.

Síðani sjónvarp Føroya varð sett á stovn í 1984 hava arbeiðsumstøðurnar í sjónvarpinum verið so út av lagi vánaligar, at neyðugt er sum skjótast at gera nakað, so starvsfólkið fær rúmligari arbeiðsumstøður. Støðan viðvíkjandi høllisligu-og figgjarligu trupulleikum sjónvarpsins eru lítið broyttar í mun til í fjør. Tað hevur verið arbeitt við at útvega sjónvarpinum ornur høllir, men kortini er eingin endalig viðgerð liðug. Tað er eingin loyna, at sjónvarpið í løtuni er í sera sera svárum figgjarligum trupulleikum og at neyðugt er við eykainntøkum her og nú, og sjálvt um landsstýrið hevur givið sjónvarpinum heimild til at útvega sær eykainntøku við lýsingum, so verður kortini neyðugt við beinleiðis játtanum.

Landsstýrið hevur sett nevnd at virka fyri at fáa heim aftur til Føroya skjøl, sum eru dýrgripir í søgu okkara og mentan og nú donsk/føroysk arkivavtala er gjørd, er leiðin løgd til at fara víðari eitt nú at fara undir samráðingar við sviar um kongsbókina seyðabrævið og eisini samráðingar við onur lond.

Arbeiðsbólkur hevur greitt úr hondum álit um tjóðsavn í Hoyvík. Tær umstøður, sum okkara framsýningar húsast undir, also tað sokallaða tjóðsavn okkara, eru so vánaligar, at landsstýrið átti at umhugsað at stongt hesi høli, til betri og verdugari loysn varð funnin. Teir eru og verða ein landaskomm í núverandi hølum. Men ein loysn er tað kortini, at málsetningurin í álitinum er at hava eitt savn liðugt útbygt, áðrenn henda øldin er runnin. Tilgongdin til Fróðskaparsetur Føroya er vaksandi og tykist tann útbúgvingin, har kann nemast, at standa fult mát við líknandi útbúgvingar uttanlands. Hetta, at fleiri av teimum ungu ikki nýtast av landinum at nema lærdan lestur, er ein sjálvsagdur styrkur fyri samfelagið, og tann serkunnleiki, ið ein hægri læristovnur savnar og framleiðir, gevur fólki okkara størri medvitan og størri sjálvbjargni.

Ein annar mentunnarspurningur, sum eg eri ógvuliga fegin, um er loystur, tað er tollspurningurin á ljóðføri. Hetta vóru spurningar sum vístu seg at vera truplir, og sjálvt um vit longu miðskeiðis í 1985 saman við Føroya undirhalds tónleikarafelag vístu á hesar trupulleikar, so eydnaðist ikki at fáa tollin á ljóðføri lækkaðar fyrr enn í vár.

Í vár samtykti løgtingið sum kunnugt lóg um almanna-og skúlabókasøvn og endamálið er at spjaða bókasavnstænastuna út í Føroyum, til tess er samtykt at skipa sjey sokallað meginbókadømi. Í hvørjum meginbókadømi verður eitt væl útgjørt meginbókasavn, sum tekur sær av bókasavnstænastuni á staðnum og í dømum, um ikki annað er avrátt frammanundan. Ætlanin við meginbókasavns tankanum er, at fáa bókasøvnini út soleiðis, at allir landsins íbúgvar fáa so frætt sum til ber somu søma ir tá tað snýr seg um bókasavnstænastu. Meginbókasøvn skulu verða á hesum støðum, eitt í Suðurstreymoy, sum skal verða í Havn, eitt í Sandoynni, sum skal verða á Sandi, eitt í Suðuroynni, sum skal verða á Tvøroyri, eitt í Vágoynni, sum skal verða í Miðvági, eitt í Norðurstreymoy plus Norðureysturoy, sum skal verða í Hvalvík, eitt í Suðureysturoy, sum skal verða á Glyvrum, eitt í Norðoyggjum, sum skal verða í Klaksvík.

Sum kunnugt hevur fornminnisavnið umsitið prestagarðin á Nesi, nú er gjørt av, at prestagarðurin á Nesi skal umskipast til sjálvognarstovn, og at navnið Nessetur, nessetur skal í framtíðini verða brúkt til undirvísingar skeið- og lestrarvirksemi, sið- og søguligt málsligt og listaligtt øk og skal samstundis verða minnissavn fyri teir báðar V.U.

Hammershaimb og Friðrik Petersen og aðrar kirkjumenn.

Eitt nýtt fornminnsavn Fornið er komið á Glyvrum og er undir bygdasavnslógini. Keypið er fíggjað við 50% úr landskassanum, og verða eisini partar av rakstrinum fíggjaðir tann vegin sambært bygdasavnslógina. Tá ið eg nú havi nevnt hesi bæði søvnini, so kann eg ikki láta vera við at nevna Blásastovu í Norðagøtu, sum ein sannan dýrgrip í føroysku mentanini.

Harra formaður. Eg skilji, at tíðin er farin, men eg fái kanska møguleika at koma aftur.

Tordur Niclasen (kfff.)Viðmerking

Harra formaður. Tað var ein lítil fyrispurningur til landsstýrismannin í mentamálum. Nú var hann inni á hølistrupulleikunum hjá Sjónvarpi Føroya, tað er eingin loyna, at har er trupulleiki, so tað forslær, har eru trongar umstøður, men hetta fær meg at hugsa um eitt uppskot, sum varð samtykt her á tingi fyri einum ári síðani kanska. Har varð samtykt at kanna í hvønn mun, møguleikar vóru fyri, at eitt sjónvarpshús varð bygt inni í Eysturoynni. Tingið, samtykti at landsstýrismaðurin skuldi kanna hetta og síðani koma aftur við einari frágreiðing. Eg fari at loyva mær at spyrja landsstýrismannin, hvat er hent í hesum máli hetta er faktiskt tað einasta konkreta mál, sum er samtykt hvat sjónvarpinum og húsinum viðvíkir her á tingi. Er nakað gjørt í hesum máli og hvussu langt er komið viðvikjandi tí kanningini? Takk fyri.

Lasse Klein (sj.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var longu í januar mánað í ár, at eg læt løgtinginum upplýsingar úr hesum málinum, hvar ið sagt var, at tað bar væl til at byggja eitt sjónvarpshús í Eysturoynni og at tað var einki í vegin fyri, at tað kundi fremjast. Eg vísti eisini á í tí svarinum til løgtingið, at Nes kommuna hevði bjóðað seg fram og eg gangi út frá, at málið er til viðgerðar í einari ella aðrari nevnd, kanska Tordur sjálvur kundi eftirlýst málinum sjálvandi gjøgnum formannin tí, at málið sum sagt liggur til viðgerar her í løtini. Tað, sum ætlanin er nú er at útvega teimum betri hølir í fyrstu syftu. Tær hølismustøður, sum sjónarpið hevur, eru upp á umleið 500 kvadratmetrar, og tað, sum ætlanini er at fáa til vega

aftur at nú er umleið 1000 kvadratmetrar soleiðis, at teir koma upp á eitt gólvareal upp á 1500 kvadratmetrar. Tað er eingin forðing um løgtingið ynskjir at taka tað støðu at byggja í Eysturoynni, ja, so verður tað sjálvandi gjørt.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg fari at takka landsstýrismanninum fyri svarið, men tá hann sigur, at henda kanningin er komin í løgtingið, so kann eg illa fyristilla mær at kanningin er komin í løgtingið sum eitt løgtingsmál, og síðani er farið í eina nevnd, tað, haldi eg ikki, er í tráð við veruleikan. Men nú tá ið upplýst verður fyri at brúka egnu orð landsstýrismannin, at einki er í vegin fyri at skikkaður bygningur verður bygdur í Eysturoynni til sjónvarp Føroya, hvussu ber tað tá til, at landsstýrið nú roynir at finna eina loysn á meginøkinum. Eg haldi, tað er líka sum at sleppa sær uttan um spurningin, tá ið sagt verður, at um løgtingið vil hava eini hús í Eysturoynni til sjónvarpið, so kann løgtingið taka støðu til tað. Eg haldi, um landsstýri ynksti at fylgja úrslitinum av hesi kanning, at hesin stovnur kom at liggja í Eysturoynni, so var tað meira náttúrligt, at landsstýrismaðurin í mentamálum kom niðan í tingið við einum uppskoti um henda bygningin, so kundi løgtingið tikið støðu til tað.

Lasse Klein (sj.) viðmeriking

Harra formaður.

Løgtingið bað um eitt svar, um tað bar til at byggja eitt sjónvarpshús í Eysturoynni, og tað svar sum løgtingið hevur fingið er, at tað ber til at byggja.

Eini slík hús tey kosta millum 80 og 100 mió.kr. og er løgtingið sinnað til at gjalda tann peningin her og nú, so havi eg sjálvsagt einki í móti tí. Tað, sum ætlanin er í sambond við húsini, sum millum annað sjónvarpið skuldi húsast í, er, at húsini skuldu keypast til landsumsitingina. Er tað soleiðis, at løgtingið ynskir at sjónvarpið skal halda til inni í Eysturoynni, ja so flytir sjónvarpið bara út úr teimum hølunum, sum teir eventuelt fáa, og aðrir flyta inn.

Johannes Martin Olsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Eg vil fegin vita eitt sindur nærri um, hvar og hvar løgtingið er vorðið kunnað um niðurstøðuna hjá landsstýrinum ella hjá landsstýrismanninum um hesa kanningina, sum vit áløgdu landstýrinum við einum meiriluta her í tinginum at gera fyri byggja av einum sjónvarpshúsi í Eysturoynni.

Mær vitandi er eingin kanning komin higar, einki úrslit komið niðan higar í tingið. Tað er, ið hvussu so er ikki komið á mítt borð, og teir tingmenn, eg havi tosað við, hava einki sæð til nakað sum helst, so her má verða ein nýggjur háttur á ein ella annan hátt, at man kanska hevur ein postkassa, sum mær puttar nakað í sum so liggur har, men eg vil fegin fáa hesa kanningina. Eg vil fegin síggja, hvørja niðurstøðu, ið landsstýrið er komið til í hesum máli, tí tað kann ikki verða rætt, at tað er komið eitt svar, sum sigur, at tað ber væl til at byggja í Eysturoynni og at landsstýrismaðurin nú svarar, at tað liggur í einari nevnd, og at tann tingmaðurin, sum tók orðið framanundan mær kann so fara í hesa nevndina og finna útav tí. Nei, tað er landsstýrismaðurin, sum frá nevndini skal fortelja okkum, tá ið málið fyriliggur, um tað ber til at byggja í Eysturoynni ella ikki og ikki ein slutur fyri ein slatur út í tóman heim, um nakað er komið, sum eingin tingmaður hevur fingið hendur á.

Lasse Klein (sj.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er als ikki ein slutur fyri ein slatur. Eg haldi at, tá Johannes Martin Olsen ynskir svar upp á hasar spurningarnar, so eigur hann eins og allir aðrir tingmenn at spyrja formannin, sum sjálvsagt hevur ábyrgdina at tí, og ikki Lassa Klein, tí Lasse Klein hevur gjørt tað arbeiðið, hann var biðin um av løgtinginum í sini tíð.

Jóhannes Martin Olsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Nú havi eg gingið her í nøkur ár í tinginum, men eg havi ongantíð verið út fyri, at tingið hevur viðtikið eitt mál og álagt landsstýrinum at gera eitt arbeiði, og man so bara upp á eitt ella annað tíðspunkt skal koma upp til formannin og spyrja hann, hvussu tað gongur við hesum málinum. Landsstýrið er vant til at koma niðan í

tingið við einum máli ella eini frágreiðing um tað, sum løgtingið hevur álagt landsstýrinum, um teir gera nakað við tað í heila tikið. Nú standa menn úr samgonguni her uppi, og um tað ikki var orðførarin í Tjóðveldisflokkinum, ið legði merki til tað, nú undir teimum samráðingum, sum skulu fara fram við ríkið um undurgrundina, krevur og smekkar nevan í borðið, at danir skulu virða tær samtyktir, sum løgtingið kemur við. Eg haldi at vit skulu fyrst byrja at virða tær samtyktir, sum tingmenn koma við yvir fyri landsstýrinum, áðrenn vit fara at krevja, at útlendingar skulu gera tað.

Vilhelm Johannesen (jv.)

Harra formaður.

Hetta er fjórða og seinast árið hjá hesum landsstýrinum og sostatt eisini tann fjórða og seinasta løgmansrøðan, sum vit hava til umrøður her á tingi í hesum fýra ára skeiði.

Tað hevur verið soleiðis hesi fýra árini, at vit, sum hava sitið í landsstýrinum, hava havt høvi til at skriva nakað um okkara málsøkir í samband við løgmansrøðuna, og hetta havi eg nýtt høvi til øll árini, eisini í ár.

Tey málsøkini, sum eg havi umsitið, eru arbeiðaramál, íbúðarmál, aling, idnaðarmál, sjóvinnumál og lógarmál. Eg havi til hesa løgmansrøðuna eins og til tær triggjar, sum hava verið til umrøðu her framanundan, skrivað, hvussu støðan er á viðkomandi økjum, hvussu gongdin hevur verðið árinum framanundan, og tað havi eg eisini gjørt hesaferð. Eg skal ikki fara at umrøða øll hesi her málsøkini í hesi røðuni, tað verða tað ikki stund til, men eg fari at taka okkurt fram.

Eg haldi, at øll hesi málsøkini eru umrødd av tingmonnum meira og minnið, og talan hevur eftir mínum tykki ikki verið um tær heilt stóru atfinningarnar, í fleiri førum hevur talan heldur verið um positivar viðmerkingar. Í onkrum førum eru spurningar settir, t.d. spyr Asbjørn Joensen, háttvirdi løgtingsmaður, hvat ið er at skylja við tað, sum verður sagt um idnaðarmál, tá ið løgmaður í røðu sini sigur: landsstýrið heldur tó, at tað í dag er stórur tørvur á samstarvi millum føroysk virkir so, at tey kunnu ogna sær serkunnleika hvørt á sínum øki og har við gerast kappingarfør.

Tað, sum landsstýrið hugsar um við hasum orðunum er, at

vit her í Føroyum hava alt ov nógv dømir um, at fleiri fara í gongd við somu framleiðslu við tí úrsliti, at eingin hevur møguleika fyri at yvirliva, og tí halda vit, at tað er rættari, at virkini hvørt sær søkja sær kunnleika á sínum øki soleiðis, at vit fáa fleiri økir og ikki so nógv virkir á hvørjum øki, at tey eru við til at køva hvørt annað.

Tað var eisini ein annar spurningur í samband við ídnaðarmál. Tað var háttvirdi løgtingsmaðurin Signar Hansen sum spurdi um virksemið hjá ídnaðargrunninum og menningargrunninum. Har kann eg stutt greiða frá, at ídnaðargrunnurin er soleiðis skipaður, at hann skal hava betri trygd fyri sínum lánveitingum enn menningargrunnurin, hann skal hava trygd innan fyri 50% av virðinum, meðan menningargrunnurin er stovnaður við tí endamáli at veita lán har, sum tapsvandin er størri. Hann kann fara longur út í prioriteti, hann skal bara hava pant innan fyri 90%. Tað vil siga, at tað almenna hevur skipað tveir grunnar, har av annar skal játta lán, har tapsvandin er til staðar í rættiliga størri mun enn hjá hinum grunninum.

Eitt málsøki av hesum, sum eg nevndi, alingin hevur verið eitt spennandi málsøki at umsita, og tí skal eg heilt stutt siga nøkur orð um alivinnuna. Tá ið hetta landsstýrið tók við, unløgdu vit umsitingina av alivinnini, vit skipaðu eitt aliráð, sum skuldi ráðgeva landsstýrinum í øllum spurningum viðvikjandi aling, eitt aliráð sum skuldi geva viðmælir ella ummælir í samband við nýggj loyvir. Vit komu til tað niðurstøðu rættiliga skjótt, at tørvur var á meira smolti tí, at samsvar var ikki í millum sjógvalistøðir øðru megin og smoltframleiðslu hinumegin. Landsstýrið gav tí loyvi til 10 nýggjar smoltstøðir. Smoltframleiðslan var tá 1,2 mió.kr. hon er nú komin uppá 4,5 mió.kr. og hevur hetta skapt grundarlag fyri nøkrum nýggjum sjógvaliloyvum afturat soleiðis, at vit nú eru komin upp á 65 sjógvaliloyvir. Um alt gongur eftir vilð, so skuldi hetta givið eina framleiðslu í 1990 upp á 10.000 til 12.000 tons av aldum fiski. Meta vit varðisliga og seta prísin til 50 kr. kilo, so skuldi talan verið um eitt samlað útflutningsvirði upp á 500-700 mió.kr.

Tað er sjálvandi so, at tað er avmarkað í hvussu stóran mun, vit kunnu útbyggja alingina á sjónum, men alivinnan kann kortini eva meir av sær til føroyska samfelags-

búskapin, enn hon ger í løtuni, hon kann geva meir av sær við verandi smoltstøðum og verandi sjógvalistøðunum. Hetta kunnu vit gera við at framleiða meira til alivinnuna sjálvir, vit kunnu í størri mun framleiða ta útgerð, sum alivinnan hevur tørv á og vit kunnu í nógv størri mun framleiða tað fóður, sum alivinnan skal nýta.

Eitt málsøki er arbeiðaramáliní. Har er rættiliga nógv hent hesi 4 árini. Á tí økinum hava vit arbeitt rættiliga miðvíst og eg skal nevna, at vit byrjaðu um várið 1985, tá samtyktu vit eina ætlan, hareftir arbeiðseftirlitið skuldi útbyggjast við deildum kring landið, talan er um at skipa fýra deildir, av teimum eru triggjar komnar, tann fjórða skal eftir ætlanini koma í 1989.

Vit settu um somu tíð eitt arbeiðsumhvørvisráð, og hetta arbeíðsumhvørvisráðið hevur fingið álagt at gera uppskot til lóg um arbeiðsumhvørvi.

Vit hava sett serlækna í arbeiðsmedicini, og vit hava tey seinastu trý árini havt nakrar fysoterpeutar í arbeiði. Hesir hava skrásett tey brek, sum eru á okkara virkjum serliga í fiskiíðnaðinum tey brek, sum føra til at fólk gerast sjúk av sínum arbeiðsumhvørvi.

Í tingsetuni 1985 fingu vit lóg um friðtíð við løn. Friðtíðin varð longd úr 4 uppi 5 vikur. Friðtíðarprocentið varð hækka úr 9,5% upp í 12%, hetta varð alt gjørt stigvíst yvir 3 ár soleiðis, at friðtíðarprocentið í ár er vorðið til 12% og friðtíðin verður í 1989 5 vikur.

Í tingsetini 1986 tóku vit lógina um trygdargrunn veiðimanna til viðgerðar og vit framdu ta broyting í tí tingsetuni, at hesin grunnur eisi kom at veita trygd til tey fólk, sum arbeiða í fiskiíðnaðinum. Framan undan kundi grunnurin bara tryggja fiskimenn og teirra før, fiskiskip og útróðrarbátar. Í tingsetuni 1986 ella til tingsetuna 1987 arbeiddu vit viðari við lógini um eitt trygdargrunn, sum kundi umfata avreiðingar og lønir hjá ellum bæði fólki í fiskiíðnaðinum og fólki sum arbeiddi aðra staðir á landi, henda lógin vil avgreidd í tingsetuni 1987.

Í somu tingsetu kom so uppskotið um lóg um samhaldsfastanarbeiðsmarknaðarftirlønargrunn. Eftir hesi lóg skulu arbeiðsgevarar og løntakarar rinda ávísan procentpart inn í grunnin, sum so kemur at rinda út til øll tey, sum eru komin til pensiónsaldur. Eftir lógini skal inngjaldingin byrja 1. januar 19

og tær fyrstu útgjaldingarnar skulu so koma í 1992, men her hava vit so eisini valt at gera tað stigvíst soleiðis, at inngjaldingin byrjar við einum procenti og hækkar so spakuliga upp í 2% og útgjaldingin fer samsvarandi at byrja á einum lágum støði og hækkað uppeftir, sum árini ganga, og tá ið vit eru komin fram til 1999 verður talan um eina arbeiðsmarknaðareftirløn, sum svarar til umleið 50% av tí fólkapensión, sum vit hava. Á hesum málsøkinum, sum eitur arbeiðaramál, eru mál eftir at loysa, sum vit hava arbeitt við og sum vit framvegis arbeiða við.

Eg nevndi í áðni arbeiðsumhvørvislógina og eg havi fyrr nevnt eina møguliga lóg um minstulønar- ella fastlønarskipan fyri fólk á fiskavirkjum. Tað verður arbeitt við hesum báðum lógaruppskotunum, men ívasamt er, um vit náða at fáa tey fram her nú í seinasta enda av valskeiðnum.

Onkur kann spyrja, hvat um tað ikki kostar nógvan pening at útbyggja arbeiðseftirlitið í slíkan mun, sum vit gera, um tað ikki kostar nógvan pening at fáa eina arbeiðsumhvørvislóg, um tað ikki kostar nógvan pening at umsita eina arbeiðsumhvørvislóg og at hava arbeiðsmedicinara og so framvegis? Sjálvandi kostar hetta pening beinleiðis í fyrsta umfari, men eg vil halda, at aðrar vegir spara vit nógv meira pening, enn vit nýta, tí arbeiðseftirlitið skal við sínum arbeiði fyribyrgja, at skaðar henda á arbeiðsplássunum og hetta vil so aftur spara pening innan heilsurøktina innan almannaverkið og tað sama við arbeiðsmedicinaranum og arbeiðsumhvørvislógini. Hetta arbeiðið skal hava til endamáls at fyribyrgja arbeiðsjúkur og tað vil so eisini í hesum seinna endanum spara almannaverkinum og sjúkrahúsverkinum pening.

Tað hevur nógv verið tosað í nógv ár um bygdamenning, og tá ið vit hava politisk orðaskiftir, hava vit ofta lyndi til at samanlíkna, hvat hendi meðan hetta landsstýrið sat, og hvat hendi, meðan hitt landsstýrið sat. Eg haldi, at eg fari at gera nakrar samanlíkningar. Tá ið seinasta landsstýrið varð skipað gjørdu teir eitt málsøki burturav, sum at bygdamenning. Ein landsstýrismaður kona at umsita eitt málsøki, sum at bygdamenning og tað fyrsta árið eitt fíggjarlógaruppskot kom til viðgerðar her á tingi, stóð ein upphædd í uppskotinum, sum æt bygdamenning 75.000 kr. Men so hendi

tað ólukkuliga, at tá ið vit hálvt annað ár seinni fáa roknskapin fyri hetta fíggjarárið, vóru tær 75.000 kr. ikki brúktar, men tær komu á aftur árið eftir og vórðu heldur ikki brúktar, og aftaná, at vit í andstøðuni høvdu gjørt vart við hetta, so hvurvu tær 75.000 kr. av fíggjarlógini fyri tey bæði seinastu árini í valskeiðnum.

Tað hevur nógv verið ført fram serliga frá fólkafloksins síðu um, at hetta landsstýrið hevur verið so nógv í móti ymiskum økjum eitt nú at draga í landnyrðing, og eg haldi, at eg fari at gera eina samanlikning. Nú er tað soleiðis, at tað fellur mær lættast at taka Norðuroyggjar og Norðoyggjar liggja jú í ein landnyrðing frá Havnini, og tá ið eg seti meg niður og hugsi meg um hvussu nógv nýggj fiskiskip komu til Norðuroyggjar, tá undanfarna landsstýrið sat, er svarið einki. Hvussu nógv nýggj ídnaðarvirkir komu, meðan undanfarna landsstýrið sat? Svarið er eitt. Hvussu nógv sjógvalilloyvir komu, meðan undanfarna landsstýrið sat? Svarið er eitt. Smoltstøðir? Svarið er eisini ein. Skúlar? eingin, almennir stovnar, eingir. Hvussu nógv varð sjúkrahúsið í Norðuroyggjum útbygt? Einki. Taka vit so hetta tíðarskeiði frá 1985-1988, so eru fleiri nýggj fiskiskip komin og onnur eru á veg, talan er um nýmótansgerð av útróðrarflotanum, og talan er um útskifting av langfaraskipum. Ídnaðarvirkir eru fleiri nýggj komin, onnur eru flutt frá ótíðarhóskandi hølum til nýggj hølir, vit kunnu nevna ídnaðarvirkir í Kalsoynni, Kunoynni, á Viðoynni og á Borðoynni. Tað eru 11 sjógvalilloyvir komin í hesum landsstýrinum, tey eru komin í Hvannasundi, á Árnafirði á Borðoyarvík og í Haraldssundi. Tað eru tríggjar smoltstøðir komnar í Kunoy, í Svínoy og á Viðareiði. Støða er tikin til, at fyrsti og annar G skulu skipast í Norðoyggjum, hetta eru skúlaøkir og stovnar.

Vit hava fingið deild av Likningarráðnum, vit hava fingið deild av Arbeiðseftirlitinum, vit hava fingið vardan verkstað, vit hava fingið fritíðarheim o.s.f. Hatta er munurin. Eg haldi, at vit uttan at seta 75.000 kr. á fíggjarlógina hava framt ta bygdarmenningina, sum undanfarna landsstýrið skuldi fremja.

Tað verður í hesum døgum nógv ført fram um, at í hesum landsstýriskeiðnum eru 500 nýggj almenn størv sett, hetta er serliga Fólkaflokkurin, og hetta er drigið fram í málgagni Fólkafloksins, hettar er drigið fram í orðaskiftinum um løgmansrøðuna. Eg kann ikki vátta, um talið 500 er rætt, men eg kann spyrja, um tey, sum eru farin úr starvi eru tikin frá, eg kann eisini spyrja, um hædd er tikin fyri, at fleiri flyta úr einum almennum starvi í eitt annað alment starv, men hvat eru so almenn størv? Tað eru størv innan sjúkrahúsverkið, tað eru størv innan skattaumsitingina, tað eru størv inna almannaverkið, tað eru størv innan arbeiðseftirlitið o.s.f. Tá ið fólkaflokkurin og til deils Sambandsflokkurin finnast at, at tað eru so nógv almenn størv, so haldi eg eisini, at hesir flokkar skuldu gjørt vart við, hvørji størv ikki skuldu verið. Taka vit nú sjúkrahúsverkið, skuldu so tey størvini, sum sett eru á Klaksvíkar sjúkrahusi ikki verið, ella skuldu tey størvini, sum sett eru á Landssjúkrahúsinum ikki verið? Tað er ov bíligt bara at finnast at, at tað eru ov nógv almenn størv, man skal eisini vísa á, hvørji størv ikki skuldu verið sett.

Takað vit so t.d. skattaumsitingina, skuldi tað so verið líkningardeildin norðuri í Klaksvík, sum ikki var, ella skuldi tað verið Líkningardeildin suðuri í Vági, sum ikki var, tann í Sandavági ella tann í Fuglafirði ella hvat? Har eru so nøkur almenn størv á hasum stovninum.

Tað var háttvirdi løgtingsmaður Hergeir Nielsen. Hann tosar um, at nú nærkast valið og nú byrja flokkar at føla seg fyri, hvønn teir skulu í samgongu við aftan á á eitt komandi val, og so segði hann, hvørjar treytir flokkarnir seta, og har nevndi hann, at Javnaðarflokkurin hevur nevnt javnstøðislógina. Eg trúgvi, at hann hevur hatta frá einum úttalilsi, sum eg segði í Oslo fyri tveimum vikum síðani, men sannleikin er tann, at eg varð spurdur, um Javnaðarflokkurin

fór at seta hetta sum eina treyt fyri at fara upp í eina samgongu. Eg segði, at tað kundi eg ikki svara fyri her og nú, men sjálvandi fór flokkurin at leggja dent á hetta, ti ein samgonga var jú slitnað upp á henda her spurningin.

Síðani var tað Torður Niclasen. Hann tosaði eisini um javnstøðislógina og um hendan fundin í Oslo. Tað var soleiðis, at á fundinum í Oslo sótu seks persónar og tað vóru teir fimm Norðurlendsku javnstøðismálaráharrarnir og eg sjálvur sum landsstýrismaður úr Føroyum. Eg fekk spurningin, hví javnstøðislógin ikki kom igjøgnum, og eg hevði eitt svarð, og her siterar Torður Niclasen, at eg skal hava sagt, at ein av grundunum til, at javnstøðislógin fall ella ikki kom igjøgnum: "Det var stærke kristne traditioner".

Harra formaður. Eg kann einki hava ímóti, at Torður Niclasen endurgevur meg her á tingsins røðarpalli fyri, hvat eg havi sagt í Oslo, men eg má tíverri rættleiða Torð Niclasen, eg havi ikki nevnt "kristne traditioner", eg segði "stærke religiøse traditioner", og tað er ein himmalvíður munur á religión og kristindómi. Vit hava muhamedanarar, tað er ein religión, vit hava buddistar, tað er ein religión, vit hava hinduarar, tað er ein religión, felags fyri allar hesar her religiónirnar er, at tú skalt gera tað og tað fyri at náa tað æviga lívið, tú skalt lata vera við at gera hetta og hatta. Kristindómurin sigur, alt er gjørt, tað er ikki neyðugt, at tú gert nakað og tað var hatta, ið eg segði og ikki nakað um sterkar kristnar traditiónir.

So var tað Pauli Ellefsen, sum legði sera stóran dent á, at teir í teirra landsstýrisskeiði høvdu sagt ja til eitt svartkjaftaskip og ikki fleiri. Eg kundi hugsað mær at spurt Paula Ellefsen, hví teir ikki gjørdu tað sama, tá talan var um farmaskipini.

Eg havi sjálvur lisið tilfarið, sakkunnleikin sigur í fyrsta lagi, vit mæla frá at tit byggja nakað av hesum farmaskipunum, og tá so hesin sakkunnleikin fær málið aftur til viðgerðar, so sigur hann, byggið so eitt, hægst tvey, men hvat gjørdi landsstýrið hjá Paula Ellefsen, teir bygdu 9 ella 10 í staðin fyri 1 ella 2, so, hevði Pauli Ellefsen kunna hildið somu linju, tá talan er um farmaskip, sum hann helt, tá talan var um svartkjaftaskip, so hevði støðan verið nógv

eðrvísi enn, hon er í dag.

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerking.

Harra formaður.

Tá ið talitíðin til viðmerkingar er ógvuliga avmarkað, so kann eg ikki gera viðmerkingar til alt hetta, her sum Vilhelm Johannesen reksaði upp, sum var hent undir sitandi samgongu í mun til seinastu, men eg kann bara avvísa, at nógv og tað allar mesta av tí, hann segði, var skeivt. Men tað vil eg fegin koma inn á, tá eg fái orðið aðru ferð.

Tað, sum eg vil spyrja Vilhelm Johannesen um, nú vit hava hann her, tí seinni vænti eg ikki at eg fái svarð frá honum er, vit hava fingið eitt aliráð og aliráðið hevur gjørt eitt tilmæli til landsstýrið og vit hava fingið tað útleverað her í løgtinginum. Eg fari at spyrja landsstýrismannin, hvussu tað er við alivinnuni í Hvannasundi.

Nú var landsstýrismaðurin inni á hesum við oyggjamenning ella við bygdarmenning og gjørdi grin burtur úr undanfarnu samgongu, tað er fantastiskt. Høvdu teir so nógv til yvurs fyri bygdunum, so høvdu teir sett bygdamenningarjáttanina á aftur fíggjarlógina, men har er hon so ikki komin, og bygdamenning sum so frá politiskari síðu, haldi eg skortar stórvegis uppá.

Vit siggja her á síðu 7 í løgmansrøðuni, at nú skal landsstýrið broyta reglurnar fyri Menningargrunnin fyri at játta hendan her tørvin. Eg vil fegin vita, hvat hasar broytingarnar ganga út uppá, er tað uppskotið hjá fólkaflokkinum, sum man nú ætlar at formulera av nýggjum og fáa inn í reglugerðina ella, hvat er tað?

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking.

Harra formaður.

Tað er soleiðis við alíloyvunum, at umsóknirnar norðan fyri Hvannasund tróta ikki, tað er rætt, og tað er eisini rætt, at landsstýrið fekk tilmælir frá aliráðnum um at geva nøkur nýggj alíloyvir, men samstundis máttu vit skeita eftir, hvussu nógv smolt er til taks nú. Tað vísti seg, at tað var ikki nóg nógv smolt í ár, til øll tey alíloyvini, sum mælt varð til, og tí valdi landsstýrið at geva nøkur av teimum soleiðis, at tað samsvarar nøkulunda, við tað smoltið, ið var til taks eftir teimum uppgerðum, sum vit høvdu fingið. Vit góvu so nøkur loyvir, men

vit hava ikki avgreitt Hvannasund enn, vit hava ikki avgreitt Hovsfjørð heldur, og eg veit ikki, um tað er eitt triðja pláss, ið vit ikki hava avgreitt, tað er møguligt, eg minnist ikki akkurát.

Men so vísti tað seg seinni, í evstu løtu, at nú leyp smolt av, men tó ikki so nógv smolt, at tað var nokk til øll tey loyvini, sum mælt var til. Tað einu tíðina sá tað út til, at 300 smolt lupu av, men so minkaði aftur og tað endaði niðri á einum 50 túsund smoltum, sum lupu av, og tey vórðu sett úr suðuri í Famjin.

Hin spurningurin um Cyggjamenningargrunn ella broytingar í lógini og kunngerðini fyri Menningargrunnin, kann eg siga, at eg í einum svari til ein fyrispurning frá Anfinn Kallsberg í seinastu tingsetu upplýsti, at vit arbeiddu við málinum, og at tað eftir ætlan skuldi verið komið niðan í seinastu tingsetu, men uppskotið liggur klárt á borðinum hjá mær nú, tað kom har í fyrradagin og tað verður lagt fyri landsstýrið á fyrstkomandi fundi soleiðis, at landsstýrið kann góðkenna eitt lógaruppskot, áðrenn tað verður lagt fram.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking.

Harra formaður.

Til viðmerkingarnar hjá Vilhelmi Johannesen um farmaskipini bæði nú og áðrenn, so skal eg einaferð afturat siga, at eg sjálvandi viðurkenni mær mína politisku ábyrgd fyri, at hesi farmaskipini komu, og tað er einki at ivast í, at eg havi mín part av tí politisku ábyrgdini av, at tað komu ávís tap av hesum farmaskipunum, m eg taki ikki ábyrgdina av, at farmaskipini fóru. Tað hevur bjóðað øll hesi árini, at tað er líka sum tað, at tað eri eg, sum skal hava pressað Javnaðarflokkin til at gingið við til hesi farmaskipini, og har er tað, eg meldi pass. Tí sum Ivan Johannesen greiddi ógvuliga gjølla frá í sínum innleggi, at Javnaðarflokkurin hevur atkvøtt fyri øllum farmaskipunum og harvið tveimt farmaskipum fleiri enn, hvat eg í hvussu so er havi atkvøtt fyri, og hvat vit í fíggjarnevndini hava atkvøtt fyri, so vil eg bara avvísa, at eg skal hava gingið á kroppin á javnaðaramonnum, koyr nú hesi farmaskipini ígjøgnum, tí teir koyrdu tvey ekstra ígjøgnum. Eg kann geva Vilhelmi Johannesen rætt í, at eg taki ikki ábyrgd

av hesum seinstu innvesteringunum í svartkjaftaflotan. Tí vit hava als ikki atkvøtt fyri teimum. Vit hava sagt tað, at okkara royndir innan svartkjaftavinnu vóru, at tað er ikki basis fyri fleiri íløgum, ið hvussu so er ikki tá, og slett ikki nú. Fleiri íløgur vórðu gjørdar og kortini eru innvesteraðar 600 mió.kr. í farmaskip.

Anfinn Kallsberg (ff.) viðmerking.

Harra formaður.

Eg haldið handa frágreiðingin hjá landsstýrismanninum um smoltstøðir var í so bílig.

Tað var soleiðis, at sitandi samgonga kom niðan í figgjarnevndina og bað um, at figgjarnevndin játtaði pening til at keypa minnist meg rætt 1,1 mió.kr. smolt til havbit, tí man hevði givið 12 loyvir og hesi 12 loyvini vóru ikki nokk til at taka tað smoltið, sum var.

So gevur man loyvir, man gevur eitt á Borðoyavík, man gevur 2, eg haldi 3 í Árnafirði, man gevur eini 4 í Haraldssundi, man gevur á Suðuroy og aðra staðni. Nú sigur landsstýrismaðurin at tað, lupu 50.000 smolt av, tað er tað sum eitt brúk skal hava, men mær vitandi er bara eitt av hesum alibrúkunum hesum 12, sum man hevur givið loyvi til farið í sving og hevur fingið smolt í ár, so um øll 12 loyvini høvdu verið komin í sving í ár, so hevði verið lítið í part, tað er púra sikkurt, og tí undrar tað meg, at man ikki hevur valt at geva loyvir í tí økinum, sum Aliráðið prioriterar hægst, at geva fleiri loyvir í. Tað er væl egnað, har liggur eitt alibrúk frammanundan, man veit, hvussu tað roynist í veðri, og har eru menn, sum eru meira enn fúsir fyri at sleppa í gongd, men tað mugu avgjørt verða heilt aðrar orsøkir, sum liggja aftan fyri, at hasi loyvini ikki verða givin, sum landsstýrismaðurin ikki torir at úttala.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking.

Harra formaður.

Tað var fyrst Pauli Ellefsen. Hann sigur, at hann tekur ábyrgdina av, at farmaskipini komu, men hann tekur ikki ábyrgdina av, at farmaskipini fóru, men um svartkjaftaskipini sigur hann, at "vit vildu bara ganga við til eitt ikki fleiri, og tí hava vit onga ábyrgd av, at tey í dag liggja", so er tað at eg sigi: Pauli Ellefsen, at sakkunnleinkin mælti til, at tit góvu loyvi til eitt, hægst tvey farmaskip, tað vildu tit

ikki, tit góvu 8,9 ella 10. Høvdu tit fylgt sakkunnleikanum har, so vóru so nógv farmaskip ikki farin av landinum, sum talan er um í dag, so eg haldi, at logikkurin brestur í ávisan mun, tá ið Pauli Ellefsen í svartkjaftaskipamálinum kann forsvara seg við, at hann var bara vitandi um loyvi til eitt. Men í farmaskipamálinum hevur hann onga ábyrd, sjálvt um hann var við til at geva loyvi til 9 ella 10 farmaskip.

So var tað Anfinn Kallsberg.

Tað er ikki heilt rætt, sum hann sigur. Tað eru fleiri loyvir farin í gongd, so vítt eg veit, enn tey ,sum hann nevnir, men eftirlitið við smoltframleiðsluni er ikki so neyvnt, sum eg segði í áðni. Eina tíð sá tað út til, at yvirskotið varð rættiliga stórt, so góvu vit nøkur loyvir, men so minkaði hetta yvirskotið, og kom tað so upp aftur á 300.000 smolt og síðan niður aftur á 50.000 smolt. 50.000 smolt er minni enn tað, sum ein sjógvalistøð skal brúka, hon skal brúkað eini 70.000 til 80.000 smolt.

Løgmaður (viðmerking)

Harra formaður.

Tað er ikki ókent, at Pauli Ellefsen sleingir eitt ella annað út, so er tað ein veruleiki í kjakinum.

Tí vil eg fegin spyrja, hvør hevur sagt, at javnaðarmenn hava gingið á kroppin á Paula Ellefsen fyri at fáa samtykt farmaskip? Hvar hevur tað staðið? Kemur tað upp í orðaskiftinum ídag, eg havi ikki hoyrt tað, eg trúgvi ikki, hatta er nakað um tað, at nakar gongur og trýr, at javnaðarmenn hava plágað lívið av Paula Ellefsen fyri at fáa farmaskip.

Johannes M. Olsen (sb.) viðmerking.

Harra formaður.

Tá eg las hatta, sum Atli eftirlýsir nú, tað stóð í sosialinum, tað var Sverre Midjord, sum segði tað, tá hugsaði eg um, at hann skrivaði, at teir vóru vorðnar villeiddir av tásitandi samgongu.

Mínir tankar vóru, Gud vit hvussu ofta Javnaðarflokkurin síðan er villeiddur av ymiskum, sum teir als eingi vita um, ikki minst uttanlands, tá hann kann skriva soleiðis, at villeiða her heima, hvussu ofta er hann ikki villeiddur, ella hvat álit skulu vit hava á hesum monnum, tá talan er um villeiðing.

Løgmaður viðmerking

At verða villeiddur er væl

ikki tað sama sum at hava gingið á kroppin á Paula Ellefsen fyri at fáa fleiri farmaskip.

Tað er rætt, at ósemja var millum okkum, sum umboðað Javnarflokkin í fíggjarnevndini og sambandsumboðanina í fíggjarnevndini viðvíkjandi 2 farmaskipum, tað er rætt. Men tað var útilukkandi út frá tí, at tá man hevði viðgjørt ein hóp av farmaskipum og feløgum og monnum eftir einari reglu, so mettu vit at tey 2, sum, av hvørjari grund, veit eg ikki, men tey, sum ikki vóru í krithúsinum skuldu hava somu viðgerð og somu sømdir.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Umframt tað, at tað hevur staðið svart upp á hvítt, so ivist eg ikki í at føroyingurin vil geva mær rætt í, at tað hevur eydnast Javnaðarflokkinum upp á ein sera effektivan máta at fingið okkara fólk at trúgva, at teir eru vorðnir pressaðir til at ganga við til hendan her svartkjaftaflotan. Hetta er ein veruleiki og tað er eitt stórt yvirraskilsi, tá eg møti monnum sum siga "tit keyptu øll hesi". Tá sigi eg, at Javnaðarflokkurin atkvøddi fyri tveimum meira, og so ganga teir út frá, sum Atli gekk út frá í áðni, at tað er ósatt, sum eg sigi, men Atli konstaterar tað hvørja einastu ferð, at tað er kortini ikki ósatt, og tað gera tey eisini, tá tey kanna málið nærri.

Tað, sum eg vil avvísa, er, at vit hava biðið javnaðarmenn um at gingið við til farmaskip. Tvørtur ímóti, vit taka ábyrgdina av tí, sum er hent innan fyri farmaskipaflotan, og í grundini havi eg sagt, eg kann eisini taka politisku ábyrgdina av tí, sum hinir hava koyrt ígjøgnum, sum eg sjálvur var ímóti. Men frá tí og so at geva okkum tað skoðsmál, at vit hava kroyst Javnarflokkin til at atkvøða fyri hesum farmaskipunum, tað er tað, sum eg avvísi totalt, og eg kann upplýsa til vanliga upplýsing fyri fólki, at sjálvandi eydnaðist tað ikki Javnaðarflokkinum at royna at fáa okkum at ganga við til hesar her svartkjaftaíløgurnar, sum vit søgdu vóru burtur av leið út frá ti grundarlagi, sum tá lá fyri, men sum Javnarflokkurin nú hevur gjøgnumført. Tær liggja inni á Skálafjørðinum, vit kunnu fara inn ein túr at hyggja eftir teimum. Tað er ikki serliga hugnaligt, og har er tað,

Sambandsflokkurin ikki kann taka ábyrgdina av hasum har, tí vit ávaraðu í móti tí, og vit atkvøddu ikki fyri tí, vit tóku ikki undir við tí, og tí er tað ikki okkara ábyrgd, tað er tykkara.

Eyðun Viderø (ff.)

Harra formaður.

Nú var tað so frægt, at eg hevði ein kjans at sleppa ínn í millum holmgonguna millum núverandi og fyrrverandi løgmann, teir munnu fara at finna sananaftur seínni, tað rokni eg við.

Tá ið eg hevði orðið seinast gekk tíðin undan. Eg var í ferð við at gjøgnumganga samferðsmál og tað, sum hevði áhuga har suðuri í valdøminum hjá okkum, har suðuri á Sandoynni.

Eg nevndi um arbeiðið í Skopun og á Sandi. Tað á Sandi skal í gongd nú, men í samband við arbeiðið í Skopun hevði eg ein fyrispurning til landsstýrismannin. So vítt eg veit, hevur hann ikki svarað mær upp á hann um, hvussu teir skulu nýta grótið, sum kemur av dýpingíni av Pollinum, tað hevur hann so ikki svara uppá, antin hann ikki kann svara ella, hvat tað er, tað dugi eg ikki at siga.

Harumframt verður nú arbeitt í Húsavík við bátahylin, sum er komin rættiliga væl áleiðis, og sama verður gjørt við at longja um bryggjuna í Dali.

Eitt øki í valdøminum har, sum hevur serligan tørv fyri einum formi fyri eini bátahavn er í Skúvoy, men nú vita vit, at Skúvoy er ein so lítil kommuna, at tað er ógvuliga avmarkað, hvat hon orkar at koma í gjøgnum fíggjarliga.

Men nú vita vit tað, at Fólkaflokkuirn hevði eitt uppskot í løgtinginum um serjáttan til smærri havnir ella bátahavnir á útoyggjunum og vita hvørja lagnu tað fekk, tað var felt her í tinginum, tað fekk ikki undirtøku. Í tí uppskotinum vóru nakrar smærri oyggjar nevndar, so sum Mykines, Skúvoy, Hestur og so úti í Svínoy og tá varð nokk Kalsoyggin nevnd eisiní, men nú hevur Kallsoyggin fingið ein annan status, tað er talan um eina ferjulegu í samband við samferðsuviðurskiftini har í oynni og berghol o.s.v.. Hetta varð ikki samtykt.

Tað fyrsta málið, sum viðvikti hesum bátahylinum var havnin í Hesti. Hetta málið varð lagt fram av landsstýrinum, har var talan um frá teirra síðu at játta 25% í kommununnar part, tað vil siga 75% úr landskassanum og vístu á tá aftur har umstøður hjá hesi kommunu at fíggjar tær, ella gjalda og vit fingu eisini við hald í tí frá tingmonnum bæði

innan samgongu og úr andstøðuni, men málið fór í samferðslunevndina og tað var í samferðslunevndini at man fekk semju um, at tað var ov tungt hjá hesi lítlu kommunu at gjalda 25%, lat okkum taka hendur saman og játta kommununi 85% soleiðis, at hennara partur var 15%, og hetta hevur so verið fyrimyndin, sum vit brúka síðan tá, og tað var tað, sum gjørdi tað at tað, var møguligt hjá Skúvoyar kommunu at fara undir eina lítla havnarbygging ella bátahyl, sum teir nú arbeiða fyri, hvar ið løgtingið hevur játtað 85%.

Síðan havi eg ein lítlan fyrispurning til umhvørvismálaráðharran, nú er hann ikki staddur her í løtuni tíverri, men tað var eitt mál, sum kom frá samferðslunevndini í sambandi við álitið hjá samferðslunevndini apríl 1987, og tað er viðvíkjandi dáking.

Har sigur henda nevndin við formansins loyvi.

Tað er mál viðvíkjandi dálking stavandi frá húsarhaldum, virkjum o.ø. Tá ið ávisar kommunur í umsókn teirra hava gjørt vart við tað støðugu dálking av sundum og firðum, sum ger seg galdandi, so hevur nevdin hildið tað verið rætt at tikið henda spurning í hetta álit.

Dálking av sundum og firðum hevur sum kunnugt ymiskan uppruna og stavar eina mest fra tí, sum dagliga rennur frá virkjum, húsarhaldum og o.ø. bygningum út á sjógv. Vitandi, at landsverkfrøðingurin hevur kortlagt allar kloakkir í landinum, er nevdin av teirri áskoða, at mest natúrligt er, at hesin stovnur kemur við tilráðing um, hvussu dálking, stavandi frá húsarhaldum, virkjum o.ø. bygningum kann minkast.

Nevndin setti fram soljóandi uppskot til samtyktar:

Álagt verður landsstýrinum at heita á landsverkfrøðingin sum skjótast at gera uppskot og kostnaðarmenting av tiltøkum, sum minka um dálkingina av sundum, firðum, vøtnum, sum kemur frá húsarhaldum, virkjum o.ø. bygningum, og hetta varð samtykt við 26-0 atkvøðum í apríl 1987.

Mær vitandi er ikki nógv hent á hesum økinum og tí vildi eg biðið umhvørvismálaráðharran sagt okkum, hvat ið landsstýrið hevur gjørt við henda spurningin.

Harra formaður. Nú fer hetta valskeiðið at verða úti skjótt. Tað er soleiðis, at tá eitt hvørt skeið er farið, so er vanligt, at litið verður aftur um bak fyri skoða verkið.

Hann, ið hevur framt gagnligt verk, hann rósar sær ofta av tí, men hann, sum hevur

gjørt tað mótsatta, roynir heldur at tiga síni mistøk burtur.

Tað er gamalt sagt um tann, sum ikki dugir at tiga tey burtur, men tekur tey fram ella verður provokeraður til tað, tá veður sagt, hvør forsvarar síni ólíkindi.

Hettar kemur einum til hugs aftaná, at hetta landsstýrisskeiðið er farið, tá løgmaður í røðuni dittar sær at siga, at samgongan gongur óskammað fram fyri venljarans dóm í heyst.

Hatta er ein undarlig niðurstøða at koma til, men hatta má svara meira til tann partin, sum sigur, hvør forsvarðar síni ólíkindi, og sjálvandi teir mugu í gjøgnum tað, teir skulu jú til vejarans dóm í heyst og tí mugu teir royna at forsvara seg sum frægast.

Tað er ein royndur lutur, at føroyingar áv natúru eru optimistiskir. Tað skal nógv til, áðrenn føroyingur missur mótið og kastar frá sær.

Nú, tá vit tosa um vánalig viðurskiftir hjá okkara fiskivinnu og vinnuni sum heild, sær ein føroyingin fyri sær við sínum optimistiska lyndi. Hann trýr uppá, at hetta fer nokk at ganga, tað koma betri tíðir, men har er ein treyt eisini, at vit frá politiskari síðu, har sum politikarin hevur ávirkan á umstøður hjá vinnuni í hesum føri fiskivinnuni, at man ikki tekur mótið frá monnum og leggur stein oman á byrðu. Tendensin til at leggja stein oman á byrðu hava vit,ið hvussu so er, sæð. Í hesum tíðum, tá samgongan tvíheldur um, at stuðulin til fiskivinnuna skal minka í versnandi fiskitíðum, tá vit hava hoyrt um tað, man skal álegga flakavirkjunum at gjalda størri part av fiskaprísinum, hóast tey, sum man sigur, eru við at fara av knóranum sum er, tey hava ógvuliga vánaligt við at klára seg.

Tað er einki at ivast í, at dómur veljarans í heyst verður at hann leitar hagar, har ávísast kann til, at teir kunnu hava møguleika fyri at síggja ljósari tíðir fyri sær til ein politikk,sum sær vandan í eyguni og tekur konsekvensirn av tí, og tí vænti eg, Føroya fólk í heyst setur álit sítt á stevnuskrá og virkisskrá Fólkafloksins.

Takk fyri.

<u>Kári Petersen</u> (jv.)

Harra formaður.

Eg ætlaði at gera

viðmerkingar til løgmansrøðuna, tað verður bæði á ti, sum hevur við arbeiðaramál og búskaparmál at gera og eftir sum at Vilhelm Johannsen, landsstýrismaður hevur gjørt so mikið við arbeiðaramál nú og greitt so nógv frá tí, so skal eg ikki gera so nógv við tað, men nú bara nevna her, at sjálvt um henda her arbeiðsmarknaðareftirlønin absolutt kann kritiserast í so ógvuliga nógvar mátar, so er millum annað við ti, at man kundi ynskt sær, at arbeiðsgevaraparturin var størri soleiðis, sum hon er á øllum øðrum pensiónsordningum, so má man siga, at hetta er eitt stórt framstig í móti tí, sum hevði hent, um hvør einasti skuldi gjørt sína egnu pensiónsskipan. Tað er nevnliga soleiðis, at tað, sum man hevur sæð í londunum rundan um okkum, hevur verið at hvør statt ella hvør samfelagsbólkur hevur gjørt sær sína pensiónsskipan, og har er tað úrslitið tað, at man hevur havt pensiónsskipan har, sum summi hava fingið millum 5 og 10 ferðir so nógv í pensión ein onnur hava fingið.

At Fólkaflokkurin hevur verið so øgiliga hart ímóti hesari pensiónsskipanini, er væl saktans jústup tí, at teir vilja hava eitt samfelag, har tað eru nøkur, sum skulu fáa millum 5 og 10 ferðir so nógv, tað er einki nýtt í hesum. Tað er bara at konstatera, at tað er eitt stórt framstig, at man fekk hesa skipanina.

Tað, sum eg annars ætlaði at nema við, var serliga búskaparmál. Tað er soleiðis við búskaparmálum, at tað er sum við øllum øðrum viðurskiftum her í lívinum, tí vanliga praktiska lívinum, at tað er betri at vera fyrivarin enn eftirsnarin. Man má royn at gera seg kláran til øll tey óhapp og øll tey ókendu fyribrygdi, sum kunnu koma fyri, og sum oftani er sagt, tað er altíð lætt at vera klókur aftaná.

Men júst í hesum, sum vit hava verið úti fyri, og sum er nevnt í løgmansrøðuni á síðu 1, at eitt tað størsta problemið, sum hevur verið tey seinast árini, tað er tað at man hevur havt ovurstóran kapital til flutning til hetta landið, og tað at man hevur fingið eitt ovurstórt búskaparligt virksemi av tí sama. Tað er eitt óhapp, sum man gott kundi forútsæð, og sum Javnaðarflokkurin sá longu seinast í 1970. Tað hendi, sum mátti henda einaferð fyrr ella senni, at tann danska rentan fór niðurundir ta

føroysku rentuna og tað, sum sjálvandi mátti henda, var at tað gjørdist eitt øgiligt trýst upp á at flyta kapital til Føroyar soleiðis at likviditeturin hjá bankunum gjørdist so ríkiligur, at man næstan ikki kundi vísa seg í einum banka uttan, at man fekk páduttað ella varð spurdur um man ikki gjarna vildi hava lán.

So er tað hetta her, sum man nú spurningurin er frammi, er nú so grúðuliga ólukka, tað hevur verið øðiliga oftani frammi at serliga Fólkafloks-menn, at hetta her hevur ikki so ringa ávirkan. Tað skal eg koma aftur til, men bara nevna heilt stutt, at hetta var ikki hent, um Javnaðarflokkurin hevði verið í samgongu fyrst í 1980. Tað var nevnliga soleið-is, at Landsbankin kundi steðga hesari gongdini, at Landsbankin var júst tað instrumentið, man hevði brúk fyri til at flyta inn allan hendan kapitalin. Landsbankin var faktiskt longu samtyktur í 1978. Tað var Landsbankin, ið skuldi sagt nei til lánini, sum vit hava fingið til Føroyar.

Sum vit øll vita, so varð hettar effektivt saboterað av Sambandsflokkinum og Fólka-flokkinum. Teir málaðu stór spøkilsir upp á veggin og kallaðu hetta bæði fyri sosi-alisering, og fyri sambands-menninar var tað serliga tað, at tað var yvirtøka, tað luk-ði av sjálsstýri, men tað, sum teir ikki vildu fortelja fyri Føroya fólki, var nevnliga tað, at Landsbankin, ið er eitt instrument ella eitt tól, sum øll framkomin íðnaðarlond hava til at stýra tí samlaðu peningamongdini í samfelagnum við. Um vit taka t.d. Fólka-flokkin so páropar sær ógvuliga ofta USA, sum fyrímynd, men eg kann bara nevna tað, at USA hevur havt ein Nationalbanka líka síðan 1813, also tað vil siga, tað eru 150 ár síðan, ið hvussu so er, at USA kundi síggja tað, at tað varð týdningarmikið at hava eitt sovorðið tól at stýra peninga-mongdini í landinum. Um vit so taka Ongland, sum eisini hevur verið ógvuliga nógv frammi sum fyrimund fyri búskapar-politikkin hjá Fólkaflokkinum, so var tað faktiskt eisini so leiðis, at tað mitt í 1800 tal inum sá, at tað varð neyðugt at hava eitt sovorðið tól til at stýra peningamongdini og kreditmongdini í samfelagnum. Hetta vildi man so ikki siga Føroya fólki frá, og faktiskt heldur ikki tað, at allir borgarligir politikarar í

øllum londunum í vesturheiminum sum heild Danmark, Noreg, Svøriki, Onglandi og USA síggja, at tað er neyðugt. Teir hava ynskt at hava hetta tólið, og teir hava verið glaðir fyri tað, ja, hetta vildi man so ikki siga Føroya fólki frá í 1978. Man vildí heldur hugsa um nakrar biligar atkvøður, man vildi heldur við at tosa um sosialisering forskrekkja fólk, og man fær við lesa blaðið hjá Fólkaflokkinum ógvuliga ofta ta kenslu, at tað er Sjóvinnubankin, sum eigur Fólkaflokkin og umvent sjálvandi eisini. Tað er klárt, at tað er Landsbankin, sum kemur at yvirtaka nakrar fáar av teimum forrætningunum, av teimum uppgávunum, sum teir privatu bankarnir hava nú. Tað sum Fólkaflokkurin eisini gloymdi at siga fyri Føroya fólki frá var júst tað, at hesar uppgávur sum Tjóðbankin ella Landsbankin kemur at yvirtaka eru sovorðnar uppgávur, sum í øðrum londum verða røktar av Tjóðbankanum, men tað var sum so ofta fyrr, tað var hugsa meir um, hvat man kundi fáa burtur úr atkvøðum heldur enn at hugsa, hvat tænti okkara landi best.

So er tað hettar her, at Fólkaflokkurin hevur roynt at seta spurnartekin er tað virkuliga so skaðiligt? Er tað nøkur ólukka fyri okkara búskap, at vit hava flutt so ræðuliga stóran kapital inn til land okkara? Tað er serliga tí, at tað hevur verið frammi í sambband við hesi her lán til kommunur, tað er serliga fólkafloksmenn, sum hava verið serliga sjúkir til at fingið hesi lánini til landið, og bæði sagt og skrivað, at tað er einki problem. Tað hevur eisini verið frammi í dag, at man hevur verið og skavað í politiska ideologiska øskudunganum og funnið út av, at tað eru millum 400 og 500 almenn størv komin í hesum her skeiðnum. So var eg so spurin, at eg fann út av at spyrja tann, sum hevði skrivað hesa greinina, hvussu man nú hevði funnið fram til hetta her, og tað hevði man funnið fram til tað, at man hevði sett 150 størv, minnist ikki til, um taðvar í 1985 ella 1986, og so fekk eg víst, at tað vóru 10 starvslýsingar í Dagblaðnum í dag. Á jú, jú man fær varhuga av tí, at tað analysiska niveau ella vísindarliga støðið er rættiliga høgt í Fólkaflokkinum, tú fært líkasum varhuga av, at tað eru ótrúliga djúp hugsnar spekulatiónir, sum ganga fyri seg har.

Um vit nú siga, at tað passar, sjálvt um man kann spyrja, um henda útrokningin júst er so rætt, so ertað tað, sum er so álvarsligt, at hesin her kapitaltilflutningurin stjelur arbeiðspláss frá fiskivinnuni.

Um vit hyggja á síðu 17 í fylgiskjølunum til løgmansrøðuni, so stendur tað viðvíkjandi byggisektorurinum, at, har er vaksið frá 210-320 mió.kr. í lønútgjalding, tað vil siga, at tað er 110 mió.kr. meira í lønum útgoldnar, ca. 15% av ti eru lønarhækkingar, tað vil siga tær 30 mió.kr. burturav hasum har, men so eru 80 mió.kr. eftir í lønavøkstri, og tað vil siga tað, um vit siga, at tað er 200.000 kr. pr. mann í byggivirkinum so svarðar 80 mió.kr. til 400 arbeiðspláss.

Jona Henriksen (jv.)

Harra formaður.

Nú er samgonga við at seta førningin frá sær, og tí er henda seinasta løgmansrøðan á hesum sinni sjálvandi øðrvísi. Hon er ein uppgerð yvir farnu árini, men so sanniliga eisini tíbetur ætlanir um framtíðina, sum gevur vónir um komandi ting, um fólksins dómur til heystar verður samgonguni til vildar.

Harri formaður.

Tá eg taki orðið, so er tað ikki fyri at viðgera løgmansrøðuna, men av aðrari orsøk.

Tá tað óivað er ein av seinastu ferðum eg eri innan tinggátt, vil eg loyva mær at takka fyri meg.

Fyri gott 13 árum síðaði kom eg at verða tingmaður og sat sum fyrsta kvinna eina tingsetu burturav. Væl varð eg tikin í móti av øllum uttan mun til flokslit. Eingi undantøk vóru gjød mær viðvíkjandi sum kvinna, nei, eg var tíbetur á jøvnum føti við hinar.

Tá tú kemur inn í ein felagsskap, so gevur tú nakað av tínum sjálvstýri, og tað má sannast í hesum tingi, serliga tá tu ert í samgongu. Nógv mál havi eg glett meg til at hava framt, men tað hava eisini verið samtyktir, eg havi verið kedd um, ja, ein ið eg vanvirdi meg sjálva fyri at atkvøða fyri, men tað kostar at verða loyalur.

Nógv er hent og nógv er broytt hesi 13 ár, eitt nú Føroyar. Vit gjørdust fleiri ferðir størri við útflytanini av sjómarkinum til 200 fjórðingar. Innan tey ymsu málsøkini eru nógvar broytingar til tað betra gjørdar. t.d. innan almannamálini, her meti eg, at dagpeningaskipan, barnsburðarfarloyvi við løn og barnastyrkur eru stór framstig saman við teimum nógvu ajourføringunum.

Her eru ikki stundir at fara út í æsir, men nú fyrrapartin vóru nøkur høgg í móti Havnini. Góðu tingmenn, lærið av Íslendingum, sum vit seta høgt, lærið av teimum at verða góðir við høvuðsstaðin soleiðis, sum teir eru tað við Reykjavík. Vilja vit ikki, at Føroyar skal verða eitt gott land at liva í, gott fyri allar landsins borgarar? Tað hevur altíð glett meg at verið við at atkvøtt fyri tiltøkum bygdunum at bata.

Lat meg nevna eitt tiltak í millum tey mongu, og tað er tyrlkutænastan. Hvat er hon ikki hent, ikki bert sum ferðasamband millum útoygjarnar og meginlandið, men eisini sum lækna og sjúrkaflutningur.

Harri formaður

Hóast úrskifting av starvsfólki vil eg nýta høvi at takka landsstovnum og rikisumboði fyri tað beinasemið, tey altíð hava sýnt, tá eg vendi mær til hesi um upplýsingar.

Í Javnaðarflokkinum eiga vit at javna og ikki at taka ein fram um ein annan, tó í hesum føri noyðist eg at gera undantak.

Eg takki mínum monnum við løgmanni á odda fyri stuðul og hjartalag og fyri hugnaligar løtur á Suðurpólinum.

Harri formaður.

Núverðandi landsstýris- og tingmanning og fyrrverandi tøkk fyri gott samstarv og hjálpsemi við ynski um eitt gott val fyri Føroya land og fólk, Gud signi tykkum, takk fyri.

Johannes Martin Olsen (sb.)

Harra formaður.

Nú er løgmansrøðan tambað út í æsir og nógv hevur verið borið fram.

Tað eru tvey mál, sum eg kanska havi havt nakað við at gera hesi árini, og tað er samferðsla og umhvørvi.

Eg legði merki til í summar, tá ið eg var í einum av teimum skandinavisku londunum, at tað var, ja, eitt kjak í rasio um hendan spurning um virðið av einum menniskja, menniskjavirði, um man skuldi brúka eitt tal, man skuldi finna fram til eitt virði, hvat eitt menniskja var vert og hetta talið skuldi millum annað ganga inn í útrokningarav veganeti og øðrum tílíkum innan samferðluna. Eg má siga tað, at eg gjørdist eitt sindur klækkur, tað kom eitt tal fram, sum ljóðaði upp á 4 mió.kr. fyri eitt menniskja, upp um tað vildi man í framtíðini ikki ofra frá almennari síðu tí man máti leggja eitt loft í. Eg nevni hetta her, tí hettar her er avgjørt nakað, sum vit koma at verða konfronterað við í framtíðini eisini, tað kemur bara eitt sindur seinni til okkara alt hettarher. Eg hugsaði við mær, tá ið orðaskifti fór fram, eg hevði lisið um, hvussu tað var í 1920 og 1930, tá ið bilurin á fyrsta sinni kom fram. Eg rokni við, vit hava ofrað nógvar pengar í okkara oyggjum her til veganet og samferðslu, men tá man ferðast runt serliga í norðanlondum, haldi eg, tað er eitt fantastiskt úrslit, ið komið er til á hesum oyggjum, tá nan hugsar um samferðslu. Tað er ikki betri nógvar staðir kanska tað er ein av teimum fremstu útbyggingunum, sum er farin fram innan fyri samferðsluna júst her í okkara oyggj.

Tá man hoyrir um tíðina frá 1920-unum og 1930-unum, tá bilurin kom fram, og sum eitt "uhyre" kom blásandi eftir vegnum og støvaði alt upp og niður í Europa, var tað ræðuligt har, sum einki annað

var tá uttan hesturin, vognuri og syklan. Tá var tað soleiðis, at tá bilurin kom fram á ein hest, so mátti bilurin steðga, og bilførarin mátti út at hjálpa manninum við hestinum, fyri at fáa hann framvið bilinum, tí hesturin ræddist o.s.v., hetta rokilsi stóð í skiggini í áravís.

Eg ivist í, at í teirri tíðini hevur tað verið mangur ein, sum hugsaði hatta uhyre kemur ið hvussu so er ikki at hava langa livitíð, fyrr ella seinni verður tað bara avtikið, og man heldur fram bara við hestavognini og við sykluni. Hetta hava helst verið spádómar, sum hava verið frammi, og vit siggja, sum liva nú í 1988, at hetta varð als ikki soleiðis. Tað, sum fekk alt hettar støvið at leggja seg var eitt sindur av kolbrinti ella asfalti sum vit kalla tað, síðan tað varð lagt á vegirnar, er tað futkomiliga støvfritt og vit koyra uttan nakað, men problemið er bara, at hetta "uhyre" framvegis hevur eina dálking við sær, sum styttir um lívið og oyðileggur heilsuna hjá menniskjum.

Tá eg sigi hetta, so er tað tí, at eg trúgvi at vit eisíni komin, eg trúgvi, at bilurin er ein tann størsta uppfinning, sum nakrantíð er gjørd, kanska flogfarið kann samaliknast við tað, men bilurin er ein fantastisk uppfinning, og eg trúgvi næstan at um vit skuldu fingið boð um, at ein jarðskjálti var á veg, so hevði eg skunda mær út og læst upp bilin og sett meg bara inn í hann, tí somikið illa er hann oftani farin, og menniskju eru komin burtur úr tí, hóast man veit, at tær størstu og syndarligastu vanlukkur eru hendar á tí økinum. Eg trúgvi, at tann tørvur, ið hann skapar og tey krøv, sum hann stillar til samfelag okkara hevur kostað okkum eina øgiliga peningamongd.

Fyri framman siggja vit nøkur projektí, sum standa fyri nú. Tey eru so peningakrevjandi og onkur segði fyri mær, at skulu vit fara í holt við hesi projekti, so krevja vit 75 menn á einum stað, 25 á einum øðrum og 25 á tí triðja, so tað verður ein stór rúgva av fólki, sum tá skal savnast saman til at virka, og hvat hetta kostar okkum og hvat tað kemur stilla av krøvum, dugi eg ikki at ímynda mær, men man spyr seg sjálvan, nær eru vit komnir á mál í hesum.

Henda samgongan, sum tað hevur verið sagt, hevur eftir mínum tykki gjørt sítt til at fingið nógv upp at standa og eg

vil siga, at ein part kann eg gott taka undir við, tað hevur gjørt land okkara betri. Men tá tað so verður hugsað um alt tað, sum man sum barn kundi ynskja sær og stilla sær upp á hylluna, man hugsaði um tá tað skuldi betalast, so kemur mær tað fyri at vit hava fingið ein yvirbygning, og vit hava brúkt úr botntangunum soleiðis, at nú byrjar skipið at verða óróligt og vit vit fara at hyggja um okkum um tað ikki er við at fáa eina slagsíðu, og hvat vit skulu gera fyri at fáa nakað í aftur botntangarnar. Tað er tað, vit stríðast við í løtuni, vit hava stórar, stórar trupulleikar við at fáa upp úr havinum, tað sum vit skulu hava niður aftur í lastina og í staðin fyri barlastina, yvirbygningurin er bara vaksin og man stendur og tosar um, hvussu vit mugu hava sama yvirbygning til hesi her 45.000 menniskjuni, sum man hevur til fleiri milliónir í øðrum londum uttan um okkum, og tá man er staddur í hesum londum og hugsar um okkara lítla land, so dugir ein ikki rættiliga at seta seg inn í tað og fata, at vit krevja ein livifót, sum skal verða líka høvur og vit skulu gjalda hetta, og tað sum vit skulu gjalda við er toskurin, sum skal skattast ella fiskurin, sum í havinum svimur.

Tá ið hetta landsstýrið tók við ella áðrenn, hoyrdi vit um alt tað, sum kann koma fram upp undir eitt val, alt tað sum verður sagt og alt tað, sum verður lovað og tey lyftir sum verða givin og tey vórðu styrkt í stórt mát av tí verandi andstøðu upp undir valið.

Tann núverandi løgmaður og tann núverandi samgonga hava staðið sína roynd við hesum fyri at kunna uppfylla síni lyftir. Okkurt var um 500 dagar at rætta alt hetta her uppaftur og fáa skipið upp á rættkjøl, sum skuldi liggja á liðini o.s.f. Eg skal ikki koma inn upp á tað, tað verður so mangt sagt, men tað er eitt og annað, sum týðir upp á, at hetta ikki hevur eydnast júst, sum ein hugsaði sær, og soleiðis man tað hava gingið fyri so nógvar, nógvar samgongur.

Nú reypar teir av, at teir hava fingið nógv fleiri skip enn hin samgongan. Tað er eitt tal og eitt tveytal her við skipum og skúlum o.s.f., so er gjørt so illa, at tað er als ikki eftirfarandi, tað sum sagt hevur verið, men ein kann hugsa, at henda samgongan, sum nú hevur sitið í 4 ár, kanska sett 2-3 mia. kr. upp eftir øðrum endanum fyri at fáa skip, hevur vaksið umsitingina av

sosialu umsitingini frá 200 mió.kr. til upp í millum 700 og 800 mió.kr.

Umsitingin av skúla-og heilsumálum er tvífaldað, og so er tað hendan vælsignaða íløguætlanin, sum skal hanga upp á eitt komandi landsstýri, hon loypir seg upp til 1 ella 1½ , kanska 2 mia. kr. tá ið avtornar, og hetta er so tað, og sum ein komandi agitatión skal til at mála upp fyri veljaranum fyri at fáa tað at síggja út, sum um hetta kanska ikki eru nøkur vandamál ella eru tey allar størstu vandamál, sum yvirhøvir ikki kunnu verða loyst, soleiðis er tað hvørja ferð.

Nú segði formaðurin í sjálvstýrisflokkinum, sum var uppi her, at tað hevði verið eitt spæl at verið fíggjarmálaráðharri undir hesi samgonguni, tí ongantið í tí tíð, hann hevði sitið her á tingi tey 20 ári ella gott og væl, hevði verið so nógvur peningur og sovorðin rikiligheit á rutta við, sum hesi árini.

Tað mugu vit nokk siga, at tað hevur tað verið, tað hava verið nógvir pengar og tað var kanska eisini tað, sum hann sá fyri sær, tá í hann hoppaði upp i hesa sosilaitísku samgongu at hann sá, at fruktirnar av tí sum undanfarna landsstýrið við skattalóginí millum annað kom at geva einar øðiligar pengar. Um hettar kemur at halda fram í komandi tíðum vita allir, tað kemur ikki. Tað verður ikki á sama hátt tey næstu fýra árini, sum tað hevur verið hesi árini. Teir pengar, sum eru innkomnir, men hvaðani vit skulu fáa hesar pengar, og hvussu tað skal rættast upp, hevur tað verið tosað um eisini í dag. Tað varð sagt av formanninum í Sambandsflokkinum, sum var uppi her og segði frá, hvussu tað gekst, tá vit komu fram at í 1980 og hvussu tað endaði.

Nú eri eg klárur yvir, at aðrir vóru við tá, sum halda, at tað endaði ikki nóg væl, tað gekk syndarliga og hava sæð lítið positivt í ti, men eg dugi ikki at síggja munin ímillum, um tað skal verða soleiðis, at endin fer at verða stórt øðrvísi hesu ferð og helður ikki, at kursurin fer at verða stórt øðrvísi enn hann var tá, og sum hann má gerast nú hjá teimum, sum skulu koma fram at aftur her og manna eitt landsstýri.

Eitt annað mál, sum nógv hevur verið tosað um er umhvørvisspurningurin.

Vit hava havt nakrar stórar lógir fyri hesi árini, sum farin eru, og vit hava eina umhvørvislóg, sum liggur til viðgerðar, og vit skulu eftir førimuni finna útav, hvat vit skulu gera her í hesum landinum.

Uttan um okkum verður nógv tosað um umhvørvisspurningin. Tað eru jú heilir flokkar, sum standa upp í dag í Europa og runt kring í heiminum bara upp á hendan spurning, og man hevur kanska havt lyndi til at skúgva hetta til viks og sað meiri, ja, hvat skal man siga ikki tikið hetta fyri at verið so álvarsamt. Men eg má siga, sum tíðin er farin og man hevur lisið tað evnið, sum fyriliggur, so verður tað eitt størri og størri álvarsemi jústí hesum málum. Eg má siga, persónliga havi eg einki ímótir, at hesi menniskju og hesir bólkar, sum hava tikið seg saman fyri at gera okkum varug við tann vanda, vit eru komin út í við okkara umhvørvi, tað er sannliga upp á tíðina, at vit fara at gera nakað við tað.

Vit hava gjørt eina rúgvu við symtomini. Tað hevur verið tosað nógv um tað, men tað hevur einki verið gjørt við sjálva orsøkina. Eg las nú um dagarnar eitt úttalisi frá einum av heimsins mest kendu vísindamonnum, hann eitur Georg Borgstrøm og er svenskari, ha sigur: "Vit mugu aftur til at respektera og virða náttúruna og hennara mongu formar fyri lív og hennara symphoniska samanspæl, vit mugu aftur læra okkum at virða reint vant sum heilagt og jørðina sum ómissiliga við sinum ávøkstri og djórum, sum okkara samtíðar skapningar og trælir og figgindar." Víðari sigur hann: "Vitanin um, hvussu sárbær vit eru, tá ið vit vraka tað guddómmiligu rammuna, sum er galdandi fyri alt lív og tilveru her á jørð, má vekjast aftur av nýggjum".

Skulu ónáðirnar, vit hava gjørt mótvegis náttúruni vendast og rættast upp aftur til menniskjaliga tilveru, tørvar okkum eina andaliga veking, eitt nýtt skaparsjónarmið og eina radikala sinnisbroyting. So skrivaði hann víðari: "Haðani er tað vit skulu byrja orðaskiftið um umhvørvið, um vit ikki fáa fyrst hetta upp á pláss er tað nyttuleyst, hvat vit finna upp á, og hvat vit gera".

Eg haldi, hesin maður hevur grein i sínum máli.

Tað eru ikki so nógv ár síðani, útvarpið viðgjørdi eina bók, sum kallaðist fyri Dómadagur. Hon varð lisin upp

og tað skakaði nógv mennisku í okkara landi. Hon snúði seg um okkara tilfeingi, hon snúði seg um fólkavøkstur og hon dreyðaði seg um dálking. Síðani tá er spurningurin verðin nógv meira aktualiseraður. Nógv fleiri pengar eru komnir inn í hann og nógvar menniskjaligar resoursir eru settar inn fyri at finna útav, hvussu vit skulu koma undan hesi katastrofu, sum vit stýra ímóti, og sum alt meira og meira kemur uppá luftina.

Eg nevndi í áðni, at menniskjan verður virðismett, tað eru politikarar, sum virðismett hetta, settu hetta viðri á menniskjan 4 mió.kr. og eg siggi fyri mær, tá man við hesum nýmótans maskinum situr og kalkulerar vegagerðir, veganetið og man roknar inn tær syndarligu vanlukkur, sum henda, so roknar man við einum tali sum 4 mió. pr. menniskja. Tað fer kalt niður eftir bakinum, man kennir ein óhugna yvir sær, tá ið man veit, at ein hevur sagt, at hesin heimur kann ikki gjalda tað, sum eitt mansbarn hevur.

Hinvegin vil eg at enda nerta sindur við eina aðra dálking, sum viðvikur okkum í Skandinaviu serliga nógv í dag, og sum ger seg galdandi her heima hjá okkum.

Tað verður sagt frá, tá ið japanarar komu inn í Kina og okkuperaðu Kina, at tá sótu mammurnar uppi í vindeygunum við børnunum og hugdu niður á gøturnar. Tá var tað eitt teim smáu børnum, sum rætti hondini út og vinkaði til soldatarnar. Hann, sum skrivar hetta, sigur: "Kanska vóru tað júst teir soldatarnir, sum drupu páps hansara, men barnið skilti tað ikki øðrvísi, tað vinkaði, tí tað helt, tað skuldi gera tað." So sigur eisini hesin, sum skrivar greinina, er tað eisini her í okkara grannalondum. Í dag, sigur hann, verður vinkað hugaliga til alt tað, sum floymir inn yvir okkara land, eins og barnið hin dagin vinkaði úti í Kina, alt tað óhugnaliga, sum floymir inn yvir okkara land. Nú varð nevnt í áðni at barnapengarnir fara til leigu av viðeofilmum. Mín áskoðan til hesar videofilmar er soleiðis, sum ein av mínum bygdarmonnum einaferð segði tað og kanska mátti bøta fyri tað alt sítt lív: "Tað er ein kloakk, sum rennur í okkara samfelagi". Ein stórur partur, ja, kanska 95% av teimum er ein rein kloakk, men barnið og vit vaksnu, vit vinka.

Vit vinka vælkomin til hetta, sum er á veg, og vit bjóða tí at verða vælkomið, tí okkara innara menniskja treingir til at nøktast, og tað er ein tørvur, vísir tað seg í okkum, sum skal nøktast.

Orsøkin verður óivað soleiðis, sum bókin sigur um hin gamla mannin og havið, at aftan á at vit hava stríðst, eins og herða samgonga nú hevur stríðst og aðrar hava stríðst og barst við henda stóra físk, sum hin gamli maðurin gjørdi tað á sinni í bókini og kom at landi, tá høvdu hávarnir etið alt tað, sum var kjøt, so tað fleyt bert ein beinagrind við síðuna av bátinum, tá ið hann lendi.

Tað skuldi helst ikki verið soleiðis hjá okkum, sum stíla fyri í hesum landi, at okkara eftirkomarar koma at síggja eina beinagrind og eitt útmøtt fólk, sum legði frá sær av tí, at vit ikki vóru upp á vakt og vit ikki stóðu verja um alt tað, sum er við at oyðileggja okkara fólk innanífrá, og ikki bara uttanífrá. Takk fyri.

Heini O. Heinesen (tf.)

Harra formaður.

Tá eg í míni fyrru røðu viðgjørdi samgonguskjalið, var ikki tíð til at koma í gjøgnum alt, men hetta ger heldur einki, ti at fleiri av mínum partamonnum hava verið inni á tí sama.

Lat meg líka skoyta upp í her at í undirgrundarmálinum er Tjóðveldisflokkurin sum ein maður.

Síðan skal eg koma til nakað, sum stendur í samgonguskjalinum á síðu 6. Tað stendur soleiðis: Skulu vit lættari sleppa fram at marknaðinum fyri viðgjørdum vørum er ein avtala við felagsmarknaðin um teirra innara marknað lívsneyðugt. Hon kann eftir landsstýrisins tykki ikki merkja limaskap, men kemur helst at krevja ávisar harmoniseringar innan tolløkið, burturbeining av verjutolli.

Tað er m.a. við hesum í huga, at landsstýrið hevur skipað serliga tollumsiting. Innflutningsgjaldsskipan okkara kemur helst eisini í vanda, tí øll onnur lond hava meirvirðis-gjald. Tí er møguligt, at eitt nýtt løgting fær slíkt at taka støðu til.

Her, sum so manga aðra staðni, er tað soleiðis, at skeri eg teg her, so missi eg teg har.

Vandin við at avtaka verjutollin er, at ein stórur partur av okkara smáídnaði kemur í vanda.

Her eru stórar íløgur gjørdar, sum koma at fara fyri skeyti, og tey arbeiðsplássini koma at hvørva.

Teir, sum koma at missa pening, eru fyrst og fremst Menningargrunnurin og Íðnaðargrunnurin, og sjálvandi teir, sum hava uppbygt hetta virksemið, sum í nógvum førum er teirra lívsverk. So eg fari at heita á landsstýrið um at kanna hetta meira gjølla, og ikki framja nakra broyting mótvegis felagsmarknaðinum, fyrr enn vit vita, hvørja ávirkan hetta fær, og so taka støðu hareftir.

Eg skal nú gera nakrar viðmerkingar til tað, sum frammkomið er undir orðaskiftinum. Anfinn Kallsberg spyr landsstýrismannin, um tað passar, at meiningin er at asfaltera byrgingina um Haraldssund. Hann sigur, at ein stór park av maskinum er komin til Haraldssunds at gera hetta arbeiðið. Eg kann upplýsa Anfinn Kallsberg, at menn frá landsverkfrøðinginum eru í ferð við at asfaltera fra Grótrætt og norð á Strond, og eisini er alfalt langt á Kunoyartunnilin.

Byrgingín um Haraldssund er 300 m long. Um asfalt verður lagt á har eisini kann gera tað sama í staðin fyri at bøta um eina ferð um vikuna. Eg kann vissa Anfinn Kallsberg um, at hetta hevur einki við avgerðina um siglingarrennu at gera.

Eg skal nú nevna nøkur av teimum arbeiðum, sum eru í gerð í Norðoyggjum, sum standa í fylgiskjølunum til fíggjarlógina. Tað stendur á síðu 50, vegir: Á Kallsoynni hevur verið arbeitt við at gera tunnilin Mikladal/Trøllanes liðugan. Arbeitt hevur eisini verði við at byggja vegin av Húsum og suður í móti Syðradali. Í Kunoynni hevur verið arbeitt við at gera vegin frá bygdini og suður móti tunnlinum liðnan, og tunnilin er væl á veg at verða liðugur, og verður hetta arbeiðið helst liðugt um ársskifti. Á Borðoynni verður arbeitt við at umbyggja vegin frá Grótrætt og norð á Strond, og eisini er arbeiði við Stangavegin í gongd. Múlavegurin er komin í gamla bygdavegin og er nú eftir at byggja einar 300 m av tí gamla vegnum, tað er bert spell, at hesin her vegur ikki var lagdur í erva. Hildið verður fram við at breiðka Oyrarvegin úr Klaksvík og suður í móti kirkjugarðinum.

Undir havnagerð stendur at, í Klaksvík er bátahavnin á Borðoyarvík liðug, og nú verða lagdar flótibrýr út. Oljubryggjan við Grótrætt, bryggja við bedingarnar og leingjan suður eftir av Kósabrúnni eru um at verða liðug. Á Blankskála er lítil lending gjørd, í Norðdepli er flakavirkisbryggjan longd við 80 m, og nú verður farið undir at gera nýtt havnaøki í hesum sambandi og bøta um verandi økið. Í Svínoy er í samband við bátahavnina í

Glógvansurð vegur gjørdur og bátastøð í gerð. So eru tvey arbeiði, sum eg ikki finni her, sum væl av peningi er játtaður til, tað er siglingarrennan í Haraldssundi, eg hugsi, har eru 10 mió.kr. játtaðar, og so er tað ein ferjulega í Kalsoynni, har finni eg heldur einki um, at nakað arbeiði er farið í gongd.

Nú tosaði Anfinn Kallsberg, ella tað var Vilhelm Johannesen, sum byrjaði við tí, um, hvat er drigið í landnyrðing. Har fóru teir at klandrast um aliloyvi, hvør hevði givið mest aliloyvi av teimum. Summir høvdu givið fólkafloksmonnum aliloyvi, sum eg skilti á Anfinni, so hevði Vilhelm givið fólkaflokksmonnum aliloyvi, nú veit eg ikki, um Anfinn fær til uppgávu at geva javnaðarmonnum aliloyvi, møguligt, hatta skal eg ikki koma so nógv inn á.

Anfinn Kallsberg tosaði um útbygging av sjúkrahúsverkinum norðuri í Klaskvík. Hann nevndi vistarheimið og okkurt annað, sum kom í tí samgonguni, sum hann sat í. Nú veit eg ikki, um hann hevur uppiborið so nógv rós fyri hatta, men eg veit, at tað eru stór arbeiði í gongd har norðuri, eg hugsi um Kalksvík, so tað skuldi Anfinn vitað alt um.

Tordur Niclasen hevur tosað so nógv um barnastyrk og almannamál, hann heldur seg líu sum eiga hetta her málsøkið. Eg haldi hetta er eitt lítið sindur við síðuna av, vit taka allir ábyrgd av hesi figgjarlógini, og Tordur Niclasen skal bara minnast til, at hetta málsøkið er tað størsta málsøkið, sum stendur á figgjarlógini. Ein stórur prosentpartur av tí skatti, sum kemur inn í Føroyum, fer til alamannamál.

Eg finni einki fylgiskjal til almannamálini, so eg haldi landsstýrismaðurin hjá honum kundi havt gjørt eitt sindur við hetta, eg kann ikki leggja tann nýggja landsstýrismannin undir, at fylgisskjølini ikki eru gjørd. Her er so einki, sum lýsir gongdina, ikki ein bókstavur. So vítt sum eg veit, so er tað millum 70% og 90% av øllum skatti í Føroyum, sum fer til almannamál. Eg vildi hildið, at man saktans kundi havt onkra frágreiðing har í fylgisskjølunum. Takk fyri.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg haldi, at tað er rætt, sum Heini O. Heinesen sigur, at tað fer nógv til almannamál, tað kunnu vit skjótt verða samdir um. Men hann kann kanska siga tinginum frá, hvar og á hvørjum øki, man kundi spært, um tað er tað, hann hugsar har.

At hann so nú líka sum brygdar undanfarna landsstýrismanni í almanna málum Niels Paula Danielsen, at eingi fylgiskjøl eru við í hesari løgmansrøðuni, tað haldi eg er heilt óskiljandi. Eg eri ikki ósamdur við Heina O. Heinesen í tí at, tað kundi verið hugaligt at havt nøkur fylgiskjøl. Men eg haldi ikki, tað er rætt at fara at geva undanfarna landsstýrismanni, sum eínki hevur havt við samansetingina av hesari løgmansrøðu at gera skyldguna fyri, at eingi fylgiskjøl eru við. Gott nokk hevur Kristiligi Fólkaflokkurin æruna, saman við tykkum øðrum fyri, hvat er avrikað á almannaøkinum og meginparturin av tí, sum er nevnt í løgmansrøðuni, men frá tí, og so at draga hann til svarts fyri, at eingi fylgiskjøl eru við einari løgmansrøðu, sum er samansett fleiri mánaðir aftaná, at hann er farin úr landsstýrinum, tað haldi eg verða við síðuna av, harra formaður.

Karolina Petersen (fr.)

Eg skuldi fyrst svara upp á nakrar spurningar, sum Tordur Niclasen hevur sett mær.

Tann fyrsti var um varda verkstaðin í Klaksvík. Leiðari varð settur fyri umleið einum ári síðani, men verkstaðurin varð ikki liðugt smíðaður tá, leiðarin var settur, og tað hevur Tordur Niclasen ivaleyst vitað, tá partamaður hansara hevði sosiala økið tá. Tað visir seg nú, at deildin hevur ikki fingið byrjað, men at hon verður byrjað nú 1. september.

Um varda verkstaðin í Vági. Føroya landsstýri hevur sett leiðara til verkstaðin har. Um sosialráðgevara til Vágs, tað eru ov fáir sosialráðgevarar í landinum, so tað eru ikki umsøkjarar til øll størv. Vardi verkstaðurin, sum skal verða atlaður at liggja við Streymin, fer væntandi ikki at liggja har, men onkra aðra staðni, og enn er ikki avgjørt hvar.

Lógaruppskotini um einkjupensión og um stuðul til for-

eldur at brekaðum børnum vóru løgd fram av Niels Paula Danielsen, áðrenn hann fór úr landsstýrinum, men eg var ikki samd við honum um hesi mál.

Almannastovan greiddi mær frá, at galdandi lóggáva kann brúkast soleiðis, at foreldur at brekaðum børnum kunnu fáa samsýning fyri at verða heima hjá børnunum.

Uppskotið um eínkjupensión gekk út uppá, at tann føroyska serveiting, sum einkir fáa so leingi, tær eiga børn undir 18 ár, skuldi ikki falla burtur tá børnini vóru yvir 18 ár. Men tað var ein semja í hesari samgongu, at tað var ikki rímiligt, at hesar konur, um tær ikki feiltu nakað, skuldu halda fram við at fáa ta stóru upphæddina aftan á, at børnini vórðin blivin 18 ára gomul.

Harra formaður. Í fyrra umfari tosaði eg mest um sosialmál og um kommunumál. Men Framsóknarflokkurin leggur ikki bara dent á hesi øki, men á føroyska samfelagið sum heild og hevur í landsstýrinum stuðlað øllum tiltøkum til frama fyri okkara vinnu, fiskivinnu, alivinnu og iðnað og onnur viðurskifti í samband við livikor føroyinga sum heild.

Føroyskur politikkur er torførur at gjøgnumskoða hjá fólki í dag. Tað er tíverri so, at tá flokkar gera mistøk, so skunda teir sær at myrkaleggja hesi, og brúka snildi og fara at t[illegible] um nakað heilt annað. t.d. hevði tað verið frígerandi um menn úr Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum fyri einaferð skyld fóru upp og søgdu: "Global skipini skuldu ongantíð verið keypt, og tað mugu tit also orsakað, øll tit, sum settu tykkara sparipening í hesi skip, tí tit vóru óvitandi um, at búskaparráði hevði mælt frá at keypa skipini".

Hvat gera teir menn, sum v[illegible] skuldu trúð virkuliga føldu ábyrgd fyri okkara fólki, teir skunda sær at koyra ábyrgdina frá sær og ákæra hetta landsstýrið fyri ikki at hava bjargað skipunum, sum um tær hundrað tals milliónir krónurnar, sum føroyski skattaborgarin mátti gjalda fyri hesi skipini ikki var nóg mikið og sum um tær nógvu milliónir, sum føroyskar familjur mistu, ikki raktu nóg hart.

So tá Pauli Ellefsen fer upp at speireka hesa samgonguna fyri ódugnaskap og Svend Age Ellefsen og Jógvan Sundstein gera hitt sama, so má eg siga, tit duga væl at leggja royk yvir veruleikan, sum var hesin: Tit dugdu ikki nóg væl at stýra, tit gjørdu nakrar brølarar, sum tað er torført at sleppa tykkum undan, og tykkara skeivu

avgerðir siggja einki frægari út í dag við nú at skelda inn á vinstrahallar flokkar, tit mugu sjálvir bera skuldina av, at tit noyddust í andstøðu.

Tá vit í Framsóknarflokkinum tóku avgerð um at fara upp í hesa samgongu, var tað ikki dámt av hesum báðum flokkum. Men eg kann vissa teir um, at vit vóru fullvís í, at vit vóru altíð líka so góð til at stýra hesum landi sum Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin. At Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin fyrí at sneiða sær nakrar stemmur einkið høvdu í móti at landi í vár skuldi fara í stjórnarloysi vísir bert ábyrgdarloysi yvir fyri okkara fólki.

Framsóknarflokkurin er ein nýggjur flokkur, men vit vita, hvat vit vilja. Flokkurin er ikki farin upp í hesa samgongu sum nakað hjáputur. Vit vita, at okkara tjóð er ein dugnalig tjóð, sum vil klára seg sjálva við ágrýtni og dugnaskapi. Okkara politikkur er, at vit vilja verða við til at skaffa okkara fólki so góð og livilig kor sum møguligt, bæði tí raska partinum av fólkinum og tí veika partinum av fólkinum.
Takk fyri.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg fari at takka landsstýriskvinnuni í almannamálum fyri, at hon royndi at svara upp á teir spurningar, sum eg setti henni í gjár viðvíkjandi ymiskum, sum farið er fram og sum ikki er farið fram á almannaøkinum.

Harra formaður. Eg setti henni henda spurningin í samband við stuðulin til at ansa eldri og óhjálpnum heima, tá ætlanin var, at hetta eisini skuldi umfata brekað børn, sum búðu heima, also foreldur við brekaðum børnum. Málið var jú komið niðan í tingið, tað var samtykt í landsstýrinum. Vit minnast, at uppskotið fall og tí loyvdi eg mær at spyrja, hvørjar ætlanir vóru her at gera nakrar ábøtur, so svarar landsstýriskvinnan nú, at hon ikki var samd við undanfarna landsstýrismanni, tað hevur hon sjálvandi loyvi til at verða, og at tað var upplýst frá almannastovuni, at hjálpin til hesi børn og foreldur kundi koma á annan hátt. Tað er rætt, at hesi foreldur kunnu fáa hjálp yvir forsorgarlógina, fyri eitt avmarkað tíðarskeið, sum aftan á biddaragongd ferð aftan á fer. Endamálið hjá okkum við hasum uppskoti var, at hesi við brekaðum børnum skuldu koma undir somu reglur, sum vóru galdandi fyri eldri og óhjálpin, sum eru búgvandi heima.

Hvussu hetta fungerar í praksis, ja, tað kunnu vit

spyrja tey, sum eru í hesari mangan sváru støðu at hava brekað børn og tá ið hesi búgva heima.

So, harra formaður eg takki landsstýriskvinnuni fyri svarið, men tað harmar meg hóast alt, at úrslitið gjørdist soleiðis, sum hon hevur givið til kennar her, og ikki tað, sum vit ætlaðu, nevniliga at hesi við brekaðum børnum skuldu koma undir somu sømdir, sum tey, sum umfatað eru av hesum stuðuli til at ansa eldri og annars óhjálptum heima.

Karolina Petersen (fr.) viðmerking

Tá eg havi greitt frá, hvat almannastovan hevur latið meg vitað, so vil eg siga tað, at eg haví onga grund til at misteinkja embætismenninar har fyri at geva mær skeivar upplýsingar.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað verður so langt frá mær at siga, at embætismenninir hava givið nakrar skeivar upplýsingar, so tess vegna nýtist Karolini Petersen landsstýriskvinnu ikki at misteinkja nakað, ti hetta vóru júst somu upplýsingar, sum táverandi landsstýrismaður Niels Pauli Danielsen fekk frá almannastovuni, at hesi kundu í ein ávísan mun fáa hjálp við forsorgarlógini, men hetta skuldi verða ein politisk avgerð. Tað skuldi ikki verða ein avgerð, sum skuldi takast á embætismannastigi, men tað var ein politisk avgerð. Hetta at foreldur við brekaðum børnum skuldu koma undir somu kor, sum tey ið annars eru undir hesum í samband við at ansa eldri og óhjálpnum heima.

Lasse Klein (sj.) viðmerking

Harra formaður.

Eg havi undir hesi viðgerð roynt at greitt so nágreiniliga frá teimum málsøkjum, sum Sjálvstýrisflokkurin í landsstýrinum umsitur, og tað hava nær um ongar ítøkiligar atfinningar verið, tað takið eg sum eitt týðuligt prógv um, at tingmenn sum heild eru nøgdir við tað arbeiðið, sum Sjálvstýrisflokkurin hevur gjørt í hesum landsstýrisskeiðinum.

Harra formaður. Fyri stuttum boðaði bretska stjórnin frá at Dounreay og ætlaða útbyggingin fór at verða steðgað, og harra formaður eg skal royna at verða lítillátur. Eg haldi ikki, at tað er ov nógv sagt at púrt einki orðaskifti var um Dounreay og ætlan tess fyrr enn eg sjálvur sum umboð sjálvstýrisfloksins fór til London saman við norðmonnum at handa Margareth Tatcher í Downing Street

nr. 10, 170.000 mótmælisbrøv í móti Dounreay.

Seinni á hesi ferð, hitti eg eisini ráðharran fyri kjarnorku í Tatcherstjórnini á skrivstovu hansara, har eg greiddi frá føroysku vandamálunum, umframt David Steel, formann fyri libirala flokkin í Bretlandi. Eisini á tíðindafundi í bretska undirhúsinum greiddi eg frá føroysku sjónarmiðunum, hetta var eisini gjørt dagin eftir í Oslo, har tíðindafundur eisini var.

Eg eri eisini fegin um tann áhuga, henda ferð skapti og tað undirtøku sum mótimælini móti Dounreay fekk her heima á landi aftan á hesa ferð.

Eyðun Viderø hevði ein fyrispurning um landsstýrið tók undir við tí áheitan, sum skipanir sendu landsstýrinum tann 30. apríl í ár í samband við Ø3 ætlanina, útbyggingina av havnini har. Har kann eg bara svara, at landsstýrið hevur í høvuðsheitum tikið undir við tí skrivinum, sum teir sendu landsstýrinum.

Heini O. Heinesen spurdi, hvar pengarnir í samband við Haraldssund vóru vorðnir av, og har kann eg bara heilt stutt svara, at teir pengarnir eru í tunnilsgrunninum.

Harra formaður. Annars er óneyðugt at siga frá, at frælsi og ábyrgd er lyklastøða sjálvstýrisfloksins í føroyskum politikki og at vit hava stórt álit á tí einstaka menniskjanum og tí ábyrgd, tað einstaka menniskja hevur fyri sær sjálvum, fyri sínari familju og umhvørvi.

Í Sjálvstýrisflokkinum trívist orðaskiftið um framtíðina orðaskiftið um, hvussu samfelag okkara er háttað. Vit vilja fegnir síggja longur enn bert til dagsins trupulleikar. Hetta merkir sjálvandi ikki, at vit ikki eru dyggiliga upptiknir av dagsins trupulleikum ella avbjóðingum, tvørtur í móti.

Sjálvstýrisflokkurin tók við ábyrgd, tá henda samgonga var skipað. Tann parlamentariska støðan er nú einaferð soleiðis háttað, at Sjálvstýrisflokkurin hevur havt eitt samarbeiði við triggjar aðrar flokkar, og merkir hetta sjálvsagt, at tað ber ikki til hjá einum flokki at fáa øll sín aðalmál framd. Tað er neyðugt at samráðingar fara fram, og tí hendir tað meira enn so, at atfinningar koma bæði í móti einari og aðrari viðgerð, tað kann verða við góðum rætti. Eftir stendir kortini, at um ein av flokkunum í landsstýrissamgonguni er stívrendur, so máar hetta sjálvsagt støðið undan einum og hvørjum samarbeiði.

Eg vil ógvuliga fegin enn einaferð undirstrika, at eingin skal vera í iva um, at Sjálvstýrisflokkurin í landsstýri og løgtingi arbeiðir fyri at fremja sjálvstýrisins politikk

og sjálvstýrisins grundsjónarmið. Tað arbeiða og virka vít dagliga fyri.

Viðhvørt eydnast tað Sjálvstýrisflokkinum at sannføra hinar landsstýrisflokkarnar um okkara sjónarmið, aðrar tíðir ikki. Sjálvt um tað ikki eydnast, so skulu øll kortini vita, at vit hava roynt, vit bíða bert eftir einum øðrum høvi at flyta hegnpelarnar í ein enn størri mun móti miðuni í føroyskum politikki. Soleiðis eru korini í politiskum arbeiði, og teimum hava vit valt at arbeiða undir og at tryggja miðuna í føroyskum politikki. Tað er ein vandamikil støða ikki at finna fram til miðuna í føroyskum politikki, so sum Sjálvstýrisflokkurin stendur fyri, harra formaður. Takk fyri.

Løgmaður

Harra formaður.

Skulu vit flyta hegnpelarnar báðu megin frá móti miðuni, so verður eitt sindur smalt, men tað havi eg nú ikki so nógv ímóti.

Harra formaður. Tað hevur verið soleiðis, at man hevur ikki kent stóra trongd til at taka lut í hesum kjaki, onkur hevur viljað verið við at tað hevur verið lítið bit í tí sum andstøðan hevur borið fram. Tað skal eg ikki døma um, men heldur siga, at eg havi mett tær atfinningar, sum eru, tað so mikið týðandi, at tað hevur verið so lítið at svara til.

Hinvegin eru sjálvsagt ávís mál og ávísir fyrispurningar, sum man hevur skyldu til at royna at svara sum frægast.

Men lat meg fyrst nevna eitt sindur aftur um hesi farmaskip og ta samanbering, sum hevur verið gjørd í millum íløgurnar og tær íløgur, sum hava verið framdar í svartkjaftaskip. Vit hava sæð eina gongd fyri okkum hvar ið hesi skip fóru okkum av hondum, tí tey áttu ikki livilíkindir. Orsøkin til at man kann siga, at í dag er, ið hvussu so er, ikki nógv, sum bendir á, at man skal gera roynd ir á hesum øki, er tann, at tað lønarlag sum er í farmaflotanum hevur gingið seg soleiðis, at tað er ógvuliga lítil áhugi hjá monnum at taka við arbeiði har umborð.

Nú um dagarnar fekk eg fyri aðru ferð víst fram eina bjargingarætlan viðvíkjandi einum farmaskipi, har tað gekk út upp á at umfíggja skipið soleiðis, at man kundi sita eitt sindur lagalígari viðvíkjandi rentum og avdrátti, men tað eina mest at raksturin skuldi fáast niður, tí pollakkar og filipinarar og aðrir skuldu manna hesi skip. Eg meini, at tá er ikki nógv samfelagsgagn hjá

føroyingum í at rinda hall í áravís, fyri at kunna varðvita nøkur arbeiðspláss til filipinarar, polakkar og aðrar.

So hevur tað verið líka sum roynt at fáa tað fast sligið sum ein veruleika, at hetta landsstýrið hevur framt nakrar mishepnaðar íløgur í svartkjaftaroyndir, og man hevur samanborið hetta. Tað sum hent er higar til er, at bygd eru 3 frystiskip, ætlað til svartkjaftaveiðu, tey kosta 80 og út í móti 100 mió.kr. stk. og eitt fjórða er framvegis undir bygging.

Tann munur er á hesum íløgum og hinum, at í ongum føri er landsstýrið bundið við meira enn 20% í veðhaldi, so tað er avmarka, hvat tapsvandin er, hann er einar 80 mió.kr. og tað eru kortini skip, sum, um alt skuldi gingið galið, kunnu nýtast til eitt hvørt endamál, um ikki føroyingar kunnu nýta tey til eitt hvørt endamál, hvar vit hava fiskiatgongd, so er onkur annar, sum kann nýta tey, so tað heilt stóra skrædlið í søluvirði er væl heldur ikki væntandi.

Eg eri als ikki samdur í, at tað sær so svart út, sum menn mála tað upp viðvíkjandi hesari vinnu. Tað gongur upp og niður og tað, sum rokkið er fyri tann pening, sum her er nýttur, er ómetaliga nógv, vit hava útviklað eina tekniska ekspertisu, sum sýnir, at her er møguligt at framleiða fars, tað er møguligt at framleiða butterflayfløk, tað er møguligt at framleiða skræðuleys/beinfrí fløk, ið hvussu so er aftan á ávísar finjusteringar.

Vit vita, sum eg nevndi í røðuni, at tað finst teknifrøði, sum ger tað møguligt at foredla hesi produkt hesa framleiðslu. Men sum tað týdningarmesta, og tað tykist, sum tveir tingmenn hava fingið eyguni upp fyri hesum, og tað vil eg takka teimum fyri og tað er Adolf V. Hansen og Olaf Olsen, sum ið hvussu so er hava havt tað á munni, at hepnast tað at fáa tað stóra tilfeingi, um ikki annað so bara tann partin av hesum tilfeinginum, sum higartil er farin fyri skjeyti í framleiðsluni, farin yvir borð eftur í framleiðsluni eini 80-90% av tí, sum er komið í troliið og komið á dekki, kann mann bara fáa nýtt tað til fóður, so skuldi ein sokallað grundinntøka verið tryggjað hvørjum av hesum skipunum soleiðis, at tað eru yvaleys nógvar royndir, sum enn mugu gerast, og nógvir møguleikar, sum enn eru troyttir og sum mugu troytast og sum mugu gerast, skulu vit fáa hetta tilfeingi til at rigga, og tað skulu vit. Tað er tann aðalmunur á hesum íløgunum og

teimum, sum vóru gjørdar viðvikjandi farmaskipaflotanum, at her er eitt rávørutifeingi, sum onkur vísti á tað størsta, sum føroyingar eiga atgongd til í løtuni. Og tað er jú nærum reint fiskaprotein og at fiskaprotein kann brúkast til alt í millum himmal og jørð, tað vita vit jú, tað er bara at fáa fatur á tí rætta endanum, tí rætta marknaðínum, tí røttu rekkju, røttu søluni.

So eg kann, íð hvussu so er boða frá, at eitt nú Havsbrún í Fuglafirði hevur ómetaligan áhuga í at fáa hesa rávøru til land í slíkari konditión, sum teir kalla tað, also soleiðis hátta, soleiðis kølda, soleiðis førda, at hon kann geva eitt fyrstaklassa fóðurmjøl. Og tað er ómetaliga stórur áhugi hjá ávísum av flakavirkjunum, ístaðin fyri at selja hesar blokkar, sum kanska eru sandmaðkafongdir og fullir av beinrestum og øðrum, heldur at arbeiða tað víðari her heima og eventuelt skornar út til fiskafingrar ella rættir og annað tílíkt. Tí tað er tann vegin, sum okkara flakavirkir skulu fara kortini hesa komandi tíðini.

Tað eri og als ikki samdur í, at tað er tann stóra katastrofan, at Føroyar hava framt íløgur fyri einar 400 mió.kr., sum eru ótryggar í hesari vinnu, og við einum tapsvanda upp á einar 80-100 mió.kr. sleppa vit við at nýta einar 200-300 kanska 400 mió.kr. og um so tað var 500 mió.kr. yvir áramálið frá 1972, tá alt hetta her byrjaði og til tað einaferð riggar. Vit fáa tað burtur úr hesum rávørutilfeingi, sum vit eiga, so er tað ikki tann stóri prísurin, sum vit hava goldið.

Vit vita, at eitt nú í kemiskum íðnaði innanfyri farmaceutiskt virksemi, har skal tú alla tíðina brúka 35% av tí, sum tú tjenar inn fyri at kunna verða ajour fyri at kunna fremja kanningar, vøruumenning, útviklan um nýggj produktir o.a. tílíkt. Og tað er slíkur íðnaður, sum teir mugu gera aðrastaðni, har teir onga rávøru hava.

Um vit skuldu brúkt eitt líknandi tal til at útvikla produktir á einum øki, hvar vit hava rávørutilfeingi, so dugi eg ikki at síggja ta stóru katastrofuna í tí. Og tí góðkenni eg ikki tann papra song, tann svana song sum menn tykast syngja yvir hesi svartkjaftavinnu. Vit skulu tvørtur í móti taka okkum um reiggj og dríva á.

Nú líkist tað ikki, helði eg sjálvur, Eilif Samuelsen at verða so insunierandi, sum hann var í sínari umrøðu av hesum í gjár at rógva soleiðis uppundir nakað óreiðiligt ella

ódemokratiskt ella skeiva mannagongd, tá ið hann spyr, hví hesi skip og hesir menn skulu stuðlast, meðan farma-menn, sum eisini eru útbløddir, ikki skuldu stuðlast, har má hann hava miskilt okkurt, hesir menn verða ikki stuðlaðir. Hesir menn hava mist síni skip, teir hava mist tær íløgur, teir hava gjørt, og teir eru spældir av við skipini. Skipini eru framvegis her í landinum, okkurt av teimum er umsett einaferð og møguliga verða tey umsett fleiri ferðir, tey fáa nýggjar eigarar. Men menninir, teir hava mist sitt, teir hava verið eins viðgjørdir, so sum teir, sum mistu í farmavinnuni. Teir í farmavinnini fingu ávís ískoyti, teir fingu ein hond-setning av og á, eitt sindur av kreppuláni, eitt sindur av ískoyti til royndir og annað tílíkt, og nøkur útlegg av nøkrum ratum soleiðis, at tað ikki var tað almenna soleiðis, sum menn vilja gera tað til, sum koyrdu hesi skip á húsa-gang, tvørturímóti. Tað almenna strekti seg so langt, sum tað kundi, legði so nógv út, sum tað hevði skyldu til og bjóðaði at leggja alt út og leggja tað deytt í nøkur ár. Tað tilboðið hava eitt nú ánararnir av svar-tkjaftatrolarunum ikki fingið, teir høvdu kanska kunnað klárað seg langt, um teir kundu fingið útlegg upp á hesi 20% also einar 16 mió.kr. og fingið tað fryst fast í nakað nógv ár, so tann insinvutiónin ella tann spurningurin, sum var settur á ein slíkan hátt, at hann skuldi fáa ein keðiligan dám, hann kann svarast soleiðis, at hesir hava als ikki verið viðgjørdir betri, kanska hava teir fingið minni sømdir enn hinir, sum høvdu større veðhald, større studningar og større útlegg, áðrenn lángevararnir tóku skip-ini. So eg havi framvegis stór-ar vónir til hesa góðu svart-kjaftavinnu.

Eitt, sum hevur verið tosað nógv um, og sum kortini vísir, at tað nú er við at koma ein ávís fatan fyri tí vanda, sum eg í 3 ella 4 ár havi vist á viðvíkjandi okkara rentuskatta-skipan, tað er, at allir flokk-ar nú siga seg til reiðar at kanna hesi viðurskiftini. Men tað er ikki so løgi, tá vit vita, at upp á 3 ár síðani 1985, er innistøðan í føroyskum peningastovnum vaksin frá 3-4 mia.kr. til 7½ mia.kr., og tað stendur sum ein uppsparing í Føroyum hjá privatum. Vit vita at hatta er ikki samsvarandi veruleikanum. Har er okkurt sum fer fram, sum hetta samfelagið ikki tolir og sum hetta sam-felagið noyðist at rætta uppá, skal tað góða í uppsparingar skipanini í rentu-

skattaskipanini varmøveitast til fyrimuns fyri tey, sum hava brúk fyri at trekkja rentur frá og til fyrimuns fyri tey, sum ynskja, at vinna mest møguligt av vinnustøðu uttan alt ov stóran skatt.

Jógvan Olsen (sb)

Harra formaður,

Í mínum fyrra innleggi viðgjørdi eg nakað av tí, sum stóð á síðu 4 og eg ætli mær at gera nakrar viðmerkingar til tað, sum stendur á síðu 5, har yvirskriftin er. Neyðugar nýskipanir, har løgmaður fyrst nemur við, at søluliðið hevur so alt stóran týdning fyri at fáa sum mest burtur úr og vísir á, at íslendingar fáa munandi meira fyri kongafisk, enn vit fáa. Tað er sjálvandi púra rætt at søluliði hevur alstóran týdning ikki bara fyri fiskivinnuna, men eisini fyri alt samfelagið sum heild. Nú kenni eg ikki munin á, hvat vit fáa fyri kongafisk í mun til íslendingar, men tað kennist eisíni eitt sindur hugstoytt, sjálvt um tað nú ikki hevur so stóran samfelagsligan týdning, at t.d. 2 fiskasløg sum síld og skøta als ikki verða keypt í Føroyum longur. Illa gongur at selja nýggj fiskasløg og tað bøtir ikki um, tá fiskasløg, ið fyrr hava verið seld, nú ikki longur kunnu handlast.

Viðvíkjandi flakavinnuni sigur løgmaður, at tað stendur í dag greitt, at flakvinna, rikin so sum verið hevur, eingi livilíkindi eigur, hon hevur kunnað verið hildin uppi við støðugt økjandi stuðulsveitingum og útjavningum, men eina ferð steðgar hetta, tí ongastaðni slepst eftir meir studningi. Vit mugu aftur í eina støðu, har tað sum, krevst til renting og avdrátt av vinnutólum umframt lønir og kapitalvøkstur, fæst inn uttanífrá. Tað, sum løgmaður her stingur út í kortíð, er ein umfatandi strukturbroyting, sum vil føra við sær, at vit skulu aftur til fiskivinnumynstrið, sum vit høvdu í 50'unum og 60'unum, áðrenn politikararnir komu við studningi, fyri at fáa fiskin uppá land í Føroyum til viðgerðar, ikki fyri fiskiskipanna skuld, men bert fyri at skapa arbeiði á landi.
Tað vil so føra við sær, at seymur skal neglast í hurðina flakavirkjunum fyrst og fremst teimum, sum eru tengd at djúpvatnsfiskinum, upsa og brosmu. Tí uttan stuðul ella útjavnan yvir landskassan, kunnu stórt sæð bert hýsa og toskur viðgerast á flakavirki við positivum rakstri. Hetta er ikki nakað nýtt, hetta hevur verið so, líka síðan flakavinnan byrjaði í Føroyum.

Skulu vit sjálvir gagnnýta hini botnfiskasløgini, so mega vit hava skip, sum annahvørt skulu viðgera fiskin umborð til salt ella frystivøru ella flyta hann feskan á marknaðin í útlondunum.

Annars sigur løgmaður, at tá tað snýr seg um svartkjaftavinnuna, so skal hon fáast at geva lønandi vinnu, og her metir hann, at tað almenna hevur skyldu til at stuðla dyggiliga, orsakað av, at so nógvir privatir eru útbløddir í hesi vinnu. Vit eiga sjálvandi at liggja á takinum á øllum fiskivinnumøguleikum, sum kunnu geva nakað av sær, og eisini innan svartkjaftavinnuna, men eg haldi, at tað er eín vána grundgeving, at tað má haldast á fram og stuðlast dyggiliga av tí almenna, tí so nógvir privatir eru útbløddir. Heldur eigur tað at siga okkum, at vit skulu fara varliga fram, og tað má heldur verða útlitið til, um vit kunnu fáa nakað positivt burturúr, sum avger, hvat eigur at verða gjørt framyvir.

Annars hevur onkur av røðarunum sagt, at tað er skaðiligt at sáa mistreysti niður í fólk, og tað er sjálvandi púra rætt.

Í dag mega vit tó ásanna, at føroyingurin í stórum rímur frá fiskivinnuni, bæði frá fiskiførunum og fiskavirkjunum og fer aðra staðir í ávísan mun í almenna vinnu. Man tað ikki koma partvís av, at henda samgonga hevur sáað mistreysti í okkara fiskivinnu, og sáað illgitan í ta føroysku fólkasálina móti øllum teimum, sum fáast við fiskivinnu á ein ella annan hátt. Eg meti tað verða illa statt í landið okkara, tá føroyingurin er farin at vanvirða sítt livsgrundarlag.

Eg vænti ikki, at góðar tíðir verða leingi í Føroyum, um vit, sum tað plagar at verða tikið til, skulu liva av at klippa hvørjum øðrum.

Harra formaður. Samgongumenn rósa sær dúgliga av øllum teimum almennu útbyggingum, sum framdar eru og tað er soleiðis, at tann, sum ikki fær sín part í slíkum pengatíðum, hann kemur í afturhond og dettur burtur ímillum. tí tá rakárini koma, tá verður lítið og einki gjørt nakra staðir.

Mítt valdømi Eysturoyggin hevur ikki fingið serliga nógv burtur úr hesi 4 árini. Vegagerðirnar, sum vóru í gerð, tá henda samgonga tók við, eru ikki steðgaðar, men har hevur verið valt at virka í " slow motion".

Havnaætlanin, sum hevur so stóran týdning fyrí eysturoyingar varð súltað so leingi, at ongin útbyggin varð gjørd í hesum valskeiði.

Nógv hevur verið gjørt

burtur úr. at skipið "Dúgvan" varð keypt at sigla millum Havnina og Skálafjørðin og tað var eitt framstig, men eg fílist á, hvussu illa skipið verður hildið, tí tað hevur nú siglt hálva vegna sum havaristur við ongari bógskrúvu í langa, langa tíð.

Eisini er tað tungt hjá veikum fólki at ganga trappurnar upp til fólkarúmini, og tí treingir tað harðliga til eina lyft. Eg havi sett fram fyrispurning um hetta mál, og sagt hevur verið, at arbeitt verður við hesum máli og lyftin skal koma, men har er eingin lyft komin enn.

Eitt mál, sum serliga Kongshavnar Kvinnufelag hevur arbeitt nógv við, er at fáa eina betri ambulancatænastu í Eysturoynna soleiðis at tíðarhóskandi sjúkrabilur hevur stað í Eysturoynni, og hetta skuldi ikki verið meir enn rímiligt, tá hugsað verður um, hvussu nógv fólk býr har. Og tá vit einki, sjúkrahús hava, skuldi tað verið sjálvsagt, at Eysturoyggin hevði eina trygga og góða ambulancatænastu. Men mær vitandi er einki ítøkiligt hent har enn, men framgongur í fylgiskjølum, at ein sjúkrabilur er keyptur til landssjúkrahúsið. Mær lysti at frætt, um nakað er hent í hasum har málinum.

Eisini hevur tað verið roynt serliga av kommunulæknum at fáa eitt apotek í Eysturoynna, men heldur ikki veit eg um, at nakað positivt er hent, hvussu stendur til við hesum málið?

Eitt annað mál, sum eg at enda fari at loyva mær at nerta við, er telefonin í Eysturoynni. Nú sigur løgmaður á síðu 19, at nýggj telefonstøð við 3000 nummarum verður sett upp, eg haldi at tað var til tann 20. oktober, og tann gamla við 1600 nummarum tikin úr nýtslu. Hetta er ikki heilt rætt, tí hetta er eingin nýggj støð men ein gomul støð, sum verður flutt úr Havn inn í Eysturoynna, meðan ein nýggj verður sett upp í Havn. Onkur sigur, at henda brúkta telefonstøðin úr Havn er gomul og ótíðarhóskandi tøknifrøðiliga séð, og um tað er nakað um tað so kann hetta ikki góðtakast, at Eysturoyggin framvegis skal verða eftirbátur í telefonviðurskiftum. Men eg vóni, at hetta ikki er so, men um telefonin ikki fer at virka nú í heyst, so mugu vit eysturoyingar fara undir serlig tiltøk hesum viðvíkjandi. Takk fyri.

Vilhelm Johannesen (jv)

Harra formaður

Fyri nøkrum tímum síðani var ein dystur her millum meg

sjálvan og háttvirdu løgtingsmenn Anfinn Kallsberg og Óla Breckmann úr Fólkaflokkinum. Ætlan mín var tá at biðja um orðið til eina rættleiðing ella nakrar rættleiðingar og nakrar viðmerkingar, men tað eydnaðist ikki. Hetta er orsøkin til, at eg biði um orðið aftur nú.

Teir hildu tað báðir verða løgið av mær at geva býráðnum í Klaksvík skyldina fyri, at skipini lógu vegna manningartrot ella sigldu undirmannað. Tað var víst á, at skipini t.d. á Flemish Cap høvdu eitt ringt ár 1987, og tá hevði Klaksvíkar býráð onga umsókn um at fáa 53 mió.kr. í lántøku til byggivirksemi. Men til hetta er at siga, at støðan hjá hesum parti av flotanum er versna. Í 1987 siglðu skipini, sum kundu hava 25, 26 ella 27 menn við, 19, 20 og 21 monnum. Í 1988 sigla somu skip við 16 og 17 monnum, tað vil siga, at støðan er versna.

Eg haldi, at allir tingmenn eru samdir um, at í mong, mong ár hava vit brúkt alment virksemi, kommunalt virksemi, byggivirksemi í heila tikið sum ein regulator soleiðis at skylja, at tá ið arbeiðsloysið tók seg upp, setti man nøkur fleiri arbeiði í gongd, almenn arbeiðir, kommunal arbeiðir og byggiarbeiðir í heila tikið. Visti tað seg, at tørvur var á fólki í fiskivinnuni, umborð á skipunum í fiskiídnaðinum, so royndi man at minka virksemið á landið. Ti tykir tað mær so løgið, at nú í ár, nú ið støðan er soleiðis, at tað er stórur tørvur á fólki til fiskivinnuna, til skipini og til virkini, at nú skulu øll hesi her arbeiðini setast í gongd, bæði av kommunum og øðrum.

Hesir báðir fólkaflokstingnenninir vístu á, at landsstýrið er kommunalt eftirlit, og tað er púra rætt. Landsstýrið er kommunalt eftirlit, men vit skulu ikki gloyma, at landsstýrið royndi, ella partar av landsstýrinum royndu at steðga, avmarka og broyta útbyggingina hjá SEV norðuri á Eiði. Vit royndu, og tað eydnaðist fyri ein part, at steðga Sundsdepilsætlanini, og vit hava roynt at avmarka lántøkurnar hjá Klaksvíkar kommunu til byggivirksemi í hesum árinum. Men hvat hava vit fingið, at vita í fólkafloksmálgagninum í øllum hesum førinum? Vit hava fingið at vita, at hetta eru politiskar hevndaratgerðir, hetta er politisk forfylging, at hetta er at spenna bein fyri politiskar mótstøðumenn o.s.fr.

Tað er lítil dugur í at verða kommunalt eftirlit, tá ið systemi virkar soleiðis, at tá

tað kommunala eftirlitið fer til arbeiðis, so verður tað landsstýrið, sum situr skuldsett fyri politiskar hevndaratgerðir, forfylging og fyri at spenna bein fyri politiskar mótstøðumenn.

Eg segði í tí fyrru røðuni, at undir seinasta landsstýri kom eingin nýggjur skúli til Norðoyggjar, men nú undir hesum landsstýrinum varð samtykt, at ein nýggjur skúli skuldi koma. Anfinn Kallsberg vísti á, at skúlin á Fossánesi var komin og at skúlin á Viðareiði var komin. Her haldi eg, at háttvirdi løgtingsmaður Anfinn Kallsberg hevur mískilt meg nakað, tí tá eg tosaði um nýggjar skúlar, hugsaði eg ikki um bygningar. Tað, at fólkaskúlin á Viðareiði er fluttur í ein nýggjan bygning hevur einki við nýggjar skúlar at gera, og tað at bygdaskúlarnir í Hvannasundi og Norðdepli eru fluttir í ein nýggjan bygning á Fossánesi, hevur heldur einki við nakran nýggjan skúla at gera. Sjálvandi fegnist eg um, at skúlin á Fossánesi er komin, at skúlin á Viðareiði er komin. Men tað, sum eg meinti við, tað var, at í skúlapakkanum er samtykt, at í framtíðini skal fyrsti og annar G verða í Klaksvík, og hetta vil føra við sær, at skúlaungdómar í Norðoyggjum, sum í dag skulu um Leirvíksfjørð bæði summar og vetur tíðliga á morgni og seint á degnum fyri at koma í skúla í Gøti tey fyrstu 2 árini av studentatíðini, kunnu ganga í Norðoyggjum. Og hatta har er at útvega ein nýggjan skúla til økið.

Síðan vísti Anfinn Kallsberg á, at Klaksvíkar sjúkrahús var útbygt við røktarheimi, meðan seinasta landsstýrið sat. Jú takk harra formaður, men sannleikin er jú tann, at samráðingarnar við ríkismyndugleikarnar um útbygging av Klaksvíkar sjúkrahúsi og um bygging av røktarheiminum, sum hevði ymiskar felags facilitetir við sjúkrahúsið, tær fóru fram fyrra hálva ár 1980, minnist eg rætt í januar 1980 og í juni 1980. Projektið varð góðkent í 1980, fíggingin var játtað í 1980 og arbeiði við at byggja byrjaði í august ella september 1980, at so byggitíðin tók eini 3 ár, og sostatt fór fram meginpartin av tíðini, undanfarna landsstýrið sat, tað er so ein onnur søga, men byggingin var greið at fara undir, tá ið tað landsstýrið tók við, og hon var enntá byrjað.

Hann nevndi eisini vistarheimið, og har er tað sama at siga vistarheimið við Garðavegin í Klaksvík. Tað var keypt tíðliga í 1980, um tað lat upp í tí árinum, kann eg ikki reiðiliga minnast, men húsið

var í øllum førum keypt og fekk landsstýrisins góðkenning.

Eg nevndi eisini fiskiskip og segði, at undir seinasta landsstýri kom einki fiskiskip í landnyrðing og Anfinn Kallsberg kundi ikki afturvísa, at har var eitt nul, men hann fór at ívast í, um 3 ella fleiri vóru komin í hesum her 4 ára skeiðnum. Til tað er at siga, at 3 eru komin og onnur eru í gerð og eru á veg.

Síðan tosaði hann um, at eini 3 alliloyvir vóru komin í Hvannasundi, og tey vóru komin í mínari tíð gott nokk, men at tey vóru greið at undirskriva, tá hetta landsstýrið tók við, tað haldi eg ikki er heilt rætt. Eg meini, at hetta landsstýrið hevði sitið í nakrar mánaðar, tá ið tey loyvini vóru givin.

Harra formaður. Síðani vóru tað nakrar viðmerkingar til háttvirda løgtingsmann Tordur Niclasen, hann helt, at hansara flokkur Kristiligi Fólkaflokkurin var tann flokkurin, sum hevði gjørt mest til bata fyri kvinnurnar í Føroyum. Hann nevndi m.a. lógina um barnsburðarfarloyvi. Nú komi eg at minnast, at fyri einum 5-6 árum síðani, legði Jona Henriksen, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram eitt uppskot um barnsburðarfarloyvi, og hetta uppskotið er tað sama sum er vorðið til lóg í dag. Eftir ti uppskotinum skuldi eisini pápin kunna taka ein part av barnsburðarfarloyvinum, tá var látur her í tingsalinum, so tað rungaði eftir í. Eg veit, at tað vóru javnaðarmenn úti um landið, sum søgdu, at teir tordu ikki út, ti fólk flentu og háðaðu at hesum uppskotinum um barnsburðarfarloyvi, har pápin kundi taka ein part av tíðini. Men í dag er henda lógin veruleiki, og nú standa øll her og kappast um, og breggja sær av hesi lógini, so nógv kan broytast eftir 5-6 árum.

Eitt afturat harra formaður. Kristiligi Fólkaflokkurin atkvøddi ímóti ta ferðirnar, Jona Henriksen legði uppskotið fram.

Tá vit tosa um at gera nakað til bata fyri kvinnurnar, so haldi eg ikki, vit kunnu lata vera við at nevna lógina um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, tað er sanniliga eitt familjupolitiskt tiltak, so tað stendur eftir, tí hóast heimaarbeiðandi mamman ella kvinnan einki rindar inn í henda grunnin, so fær hon somu arbeiðsmarknaðareftirløn sum øll hini, sum eru úti í arbeiðslívinum. So tað vil siga at, vit kunnu tosa um tvey stór familjupolitisk tiltøk, barnsburðarfarloyvis uppskotið, sum Jona Henriksen legði fram fyri 5-6 árum síðani og arbeiðsmarknaðar eftirlønina, sum er komin nú.

Eg veit ikki, um eg skal

siga so nógv afturat. Tíðin er so stutt nú, eg skal kanska hava tvey orð aftur seinni, men tað var líka Jógvan Olsen, hann stóð her og tosaði um hesa her syndarligu støðuna hjá fiski-skipaflotanum og hjá fiskivinn-uni, at bæði fiskiskipum og fiskavirkjum restaði fólk, og tá ið han hevði tosað um hetta, so tosaði hann um nakrar aðrar spurningar, men so fór hann at gremja seg um, hvussu seint tað gekk við vegagerðini í Eysturoynni, tað var "slow motion" allan vegin ígjøgnum. So eg kundi hugsað mær at spurt Jógvan Olsen: Um nú vegagerðin í Eysturoynni varð speedað upp og koyrni fimm ferðir so skjótt, hvussu hevði støðan tá verið hjá fiskiskipunum og fiskavirkjunum inni við Skála-fjørðin?

Torður Niclasen (kfff.) við-merking.

Harra formaður .

Tað var ein lítil viðmerking til æraða landsstýrismann Vilhelm Johannesen.

Tá hann sigur hetta, at fyri so og so nógvum árum síðani, fyri 6 árum kanska 8 árum síð-ani ella, hvat tað hevur verið, 6 ár síðani, tá legði Javnar-flokkurin eitt uppskot fram á ting, viðvíkjandi barnsburðar-farloyvi, og so sigur hann, at tað var tað sama uppskot, sum nú varð lagt fram.

Harra Vilhelm Johannsen, eg haldi harra formaður, at hann mistekur seg her. Tí tað upp-skot, sum kom í gjøgnum nú, kom eisini at umfata tað heimaarb-eiðandi mammuna soleiðis, at henda yvir dagpeningaskipanina skuldi fáa eina ávísa samsýning í hesum tíðarskeiði nú frá juli mánaða og upptil ½ ár, so hetta er eindømi í norðurlondum, sum eisini Hilmar Kass var inni á í gjár so hetta var ikki tað, sum uppskotið, hjá Javnarflokkinum innibar tá.

Hvør skal hava æru og ikki, tað var ein samgonga sum tá varð skipað og hetta varð nið-urfelt í samgonguskjalið. Tað er munur á at gera eina sam-gonguavtalu og harvið fáa eina politiska loysn og tað at sita í andstøðu og leggja uppskot fram, tað er ein veldugur mun-ur. Harra formaður. Tað var bara hatta, eg skuldi leggja afturat. Tá hann so kemur inn á eftirlønargrunnin, so gloymir hann her, at tær kvinnur, sum eru í arbeiði í dag, eisíni fastløntar og tímaløntar. Tað eru mangar kvinnur, ið koma at merkja tað nú, tá hesin eftir-lønargrunnurin kemur í gongd, at gjaldast skal inn í hann, at tann prosentupphæddin verður trekt av lønini, meðan hesi kanska hava brúk fyri pengum meir nú enn tá, tey koma upp í 67 ára aldurin. Nú verður pro-sentið hækkað munandi í mun til tað, tað er í dag, hjá fleiri

er tað 4 til 5%, sum verða tikin av lønini og rindað í galdandi eftirlønargrunnar. Nú skal eitt ávist prosenttal leggjast afturat, at tað so kemur til góðar, tá ein hevur fylt 67 ár, tað er so satt sum tað er sagt, men prísin betala tey so fyri tað nú.

Vilhelm Johannesen (jv.) stutta viðmerking.

Harra formaður.

Sum eg segði í áðni, so eru tað eini 5 til 6 ár síðani, at Javnaðarflokkurin legði hattar uppskotið fram her á tingi um barnsburðarfarloyvi.

Eg skal ikki pástanda, at tann lógin, sum er samtykt var júst tann sama, men í hvussu so er, er líkist tað ógvuliga nógv vikutalið var tað sama og tað, at pápin kundi, um hann ynskti tað, fáa ein part av barnsburðarfarloyvinum, tað er eisini líkist, men tað er møguligt, at Tordur Niclasen, hevur rætt í tí, sum hann sigur, at tann heimagangandi ikki var í tí uppskotinum, eg kann ikki minnast tað, og tí vil eg ikki siga tað fyri vist, eg skal ikki geva Tordi Niclasen órætt.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Tað verður mær eisini langt frá at gera Vilhelm Johannesen órætt, men eg haldi, at niðurstøðan av hesum tosinum er tann, at tað, Javnaðarflokkurin tosaði um í fleiri ár, fekk Kristiligi Fólkaflokkurin í samgongu sett í verk.

Atli Dam (jv)

Harri formaður.

Eg kann siga, at tað kravdi ikki tað stóra stríðið at fáa tað í samgonguskjalið, tí semja var um tað.

Annars havi eg til Jógvan Olsen at siga, tá hann kemur til ta niðurstøðu, ið hvussu so er um tað, sum eg havi sagt, at flakavinnan soleiðis, sum hon hevur verið rikin eigur ikki nógv livilíkindi í Føroyum, so er mín niðurstøða ikki tann, at seymur skal neglast í hurðina á flakavirkjunum tvørturímóti.

Gott nokk skal ein strukturbroyting til, ein gjøgnumgrípandi strukturbroyting helst, men, tað sum sigur okkum skriftina á vegginum klárast, tað er tað, at lønkostnaðurin her heima hjá okkum er rættiliga høgur í mun til aðra staðni, annar kostnaður er eisíni høgur, sølueffektivitetturin er rættiliga lágur og tí má so nógv gerast, og man kann ikki siggja fyri sær, at man

skal ganga tann vegin, at man skal dúva uppá, at fólk í flakavinnuni skulu gerast lágløn arfólk upp aftur meira, enn tey eru frammanundan, fyri at henda vinnan kann fóta sær.

Nei, vit mugu gera tað sum aðrir, vit mugu effektivisera, vit mugu framleiða aðrar framleiðslur og ein stórur partur av teimum vil krevja, at fiskur framvegis verður landaður til føroysk flakavikir.

Eg vitjaði í summar á Neskupstaðum í Íslandi, eitt virki, sum fær 8.000-10.000 tons á leið tað sama, sum mong føroysk virkir. 2.000 av teimum tonsunum fóru avstaðaftur nærum beinleiðis, annað hvørt sum feskt ella sum lítið viðgjørd fryst vøra, men tó so mikið, at dekningsbidragið var nóg stórt til virkið. T.d. fór allur kongafiskur, sum var yngri enn 5 dagar til Japan, og tað er ein partur av frágreiðingini, at kongafiskaprísurin í Íslandi kann vera millum kr. 1,60 og 2,00 meir pr. kg. Hugsið tykkum hvussu myndin hevði sæð út viðvíkjandi studningstørvinum í Føroyum, um kongafiskaprísurin í útlandinum gav kr. 1,60 til 2,00 meir inn í samfelagið enn, hann ger í dag.

Íslendingar arbeiða av kraft fyri at fleirtátta sína framleiðslu, gera fiskakotelettir og mangar, mangar nýggjar framleiðslur.

Norðmenn brúka ein part av rávøruni, sum hjá okkum fer í sjógv, til medisinska framleiðslu o.s.fr.

Lond, sum eru uttanfyri EF, hava lagt doyðin á at útvega sær feløg eitt nú serliga í Danmark, feløg sum ikki eru tómir skúrar, sum standa í einum og hvørjum havnabýi í Danmark, men feløg, sum eru ínnarbeidd, sum hava eina framleiðsu, sum hevur eitt markanaðar tól, sum hevur eitt søluapparat, sum hevur eina dispostión soleiðis, at man keypir ta ekspertisuna, har mugu vit eisíni liggja á takinum.

So tá ið eg sigi, at flakavinnan í ti líki, sum hon hevur verið rikin higartil, siggi eg fyri mær eina heilt aðra og størri effektivisering.

Tað hevur verið spurt Annfinn Kallsberg millum annað um, hvussu tað verður at fáa beinleiðis kvotu í Grønlandi, tað hevur sjálvsagt tann allarstørsta áhugan at vita, og Jógvan Olsen spurdi um tað sama. Tað er torført at svara.

Tit vita, at grønlendingar hava stóran tørv á teimum 220 mió.kr. sum teir fingu burtur úr EF-sáttmálanum.

Hesar 220 mió.kr. góvu EF rættin til at veiða allan avlopsfisk, sum grønlendingar ikki sjálvur sóu seg føran fyri at veiða. Á pappírinum merkti hetta, at EF keypti sær fiskirættindi fyri eina krónu pr. toskaekvalent, sum tað kallast, men í veruleikanum tað, sum teir hava veitt í mun til hesar 220 mió.kr., tað merkir, at teir hava keypt henda fisk fyri einar 3-5 kr. pr. kg.

Tað verður helst ógvuliga torført hjá føroyingum at verða við í hasari kappingini at fara og keypa veiðirættindi fyri beinleiðis pening, um tað ikki er soleiðis, sum tað hevur verið í einstøkum førum, at tað er 1% avgjald av tí, sum fæst fyri hvørt tonsið.

So um tað verður møguligt í beinleiðis samráðingum at fáa kvotur, eitt nú tær kvotur, sum vit fáa óbeinleiðis yvir EF-sáttmálan millum Grønland og felagsmarknaðin og tað, sum kemur aftur til okkara í okkara felagsmarknaðarsáttmála, tað er ikki møguligt at siga í løtuni, men vit vita at hasin spurningurin skal avgreiðast í heyst ella í vetur, tí frá 1. januar skal rammusáttmálin millum felagsmarknaðin og Grønland framlongjast, hann er at galda í 10 ár, býttur upp í tvey fimm ára skeið og nýggj avtala skal gerast fyri tað komandi fimm ára skeiðið. So vit mugu gera upp við okkum sjálvar, um vit skulu royna at vera við í hesari kapping og keypa ella vit skulu keypa, óbeinleiðis yvir felagsmarknaðin og so harafturat royna at fáa í lag eitt ávíst "joint venture" samarbeiði um troytan av ávísum kvotum, soleiðis, sum eg segði í gjár.

Tí meti eg, at tað er ein fyrimunur, um nakað kundi fingist burtur úr hesum í Føroyingahavnini. Tað er rætt, sum Anfinn Kallsberg sigur, at tá verða tað grønlendsk feløg, grønlendsk skrásett skip kanska mannað við føroyingum og støðin partvíst mannað við føroyingum, sum tað kemur at snúgva seg um. Í longdini kanska tað ikki er so eftirynskjandi, men kann tað verða grundarlag undir einum øðrum samarbeiði, sum kann mennast, um troytan av tí vaksandi toskastovninum, um troytan av tí kongafiskastovni, sum vit vita er har, og um troytan av svartkalvanum o.s.f. øll viðurskifti, sum grønlendingar hava áhuga í at fáa upp á

pláss, so hevði tað helst ikki verið burturspilt, at vit hava roynt at varðveita fótin fastan í Føroyingahavninni, í øll hesi her mongu árini. Eg komi aftur um eina løtu.

Jógvan Durhuus (tf.)

Harra formaður.

Tað var háttvirdi tingmaður Jógvan Olsen, sum hevði ein fyrispurning viðvíkjandi sjúkraflutningi í Eysturoynni. Tað er soleiðis, at Kongshavnar Kvinnufelag hevur verið ógvuliga áhugað fyri hesum spurninginum, og hevur reist hann kanska upprunaliga, og vit hava havt fundir við tey fyri kanska ikki so langari tíð síðan, umboð fyri Kongshavnar Kvinnufelag og bjargingarfelagið í Eysturoynni, og tað, sum alt bendir í móti, er tað, at tann flutningsskipan, sum kemur at vera skipað, hon verður skipað í samband við verandi flutningstænastu á sjúkrahúsinum. Hetta ti læknar á sjúkrahúsinum, læknar í Eysturoynnni og tey, sum eru áhugað í hesum her, meta tað at vera tað best gongdu leið. Tað verður so gjørt á tann hátt, at føst vaktarskipan verður, sum man sigur, samskipað við ta vaktarskipan, sum er úti á sjúkrahúsinum her. Og vónandi kunnu vit fáa hesa skipan at koyra nú í heyst.

Óli Breckmann (ff)

Harra formaður.

Sleppur henda samgonga aftur út í Tinganes eftir valið, so er mangt, sum bendir á, at tað ikki longur verður fiskivinnan, men Tinganes sum verður høvuðsvinna í hesum landi. Tað er lítil uggi hjá teimum 200 familjunum, sum mistu síni arbeiðspáss og teimum 1000 fólkunum, sum mistu sína uppsparing í farmaflotanum, at landsstýrið nú ætlar sær at seta eina sjóvinnunevnd at lúka altjóða reglur fyri sjóvinnu, at seta á stovn ein sjóvinnuskúla, og enn tá at seta í starv ein almennan fulltrúa í sjóvinnumálum nú aftan á, at føroysk sjóvinna er fokin av politiskum kleyvarskapi og skipíni vinna pening inn til okkara konkurentar.

Tann stóri trupulleikin hjá føroyskum farmamonnum í dag, sum jú sigla við donskum skipa.. aftur, er at sleppa undan dupultskatting orsaka av altjóða skrásetinginí, men hesa uppgávu vóni eg, at landsstýrið klárar sín part av, ti danski skattamálaráðharrin hevur ið hvussu so er váttað fyri mær, at hann er positivur fyri eini loysn.

Løgmaður harmast í røðuni hjá sær, at barnastyrkurin er ikki settur í mun til inntøku. Tað er rætt, har átti at verið ein prokratión, men lat tað

standa rimmar fast, sum sagt var í áðni eisini, at tað var uppskot hjá Fólkaflokkinum og vist eisini Sambandsflokkinum um barnastyrk, sum løgtingið samtykti tíbetur, tí annars hevði almannastovan havt 4000 foreldur sum klientar afturat, nú verður barnastyrkurin rindaður um gjaldstovuna.

Løgmaður sigur eisini, at Sjónvarp Føroya fær heimild til lýsingainntøku frameftir, og tað má eg siga eigur at harma tey fólkini, sum arbeiða á teimum flokspolitisku bløðunum eisini hjá samgonguflokkunum, tí tey bløðini liva jú á hungursmarkinum, at ein stórur partur av tí lítlu lýsingarinntøku, sum hetta landið hevur, nú verður slúsað burtur frá teimum politisku málgøgnunum og yvir í ein almennan stovn, sum framanundan hevur lógarfestan monopolrætt, also ein framíhjárætt at krevja hyggjaragjald við politi og rættarfylgjum fyri tann, sum ikki rindar, cman á eina fasta peningajáttan á fíggjarlógini. Men tað er, sum sagt hevur verið so mangan, tann sum hevur honum skal verða givið, so hetta verður also ein dupultur framíhjárættur sum tíðindamonopolini fáa, so væl mugu tey dugna hesum samgonguflokkunum í teirra politiska arbeiði.

Harra formaður. Løgmaður sigur fram í móti endanum, at samgonga kann ganga óskamma fyri veljarans dóm. Ja, er tað politiska sjálvrættvísið nóg stórt, so fellir tað jú lættari at bita høvdið av allari skomm.

Tá løgmaður heldur vil lata frá sær eitt búgv, sum er styrkt og konsoliderað, sum hann tekur til, so kann hann væl bara vísa til tann almenna partin av hesum búgvi, sum nú kostar 1000 mió.kr. meira árliga enn í 1984. Hyggja vit so eftir, hvar ið hesin vøksturin er farin fram á fíggjarlógini, so vísir tað seg at heilsa, skúli og almannamál, sera peningakrevjandi postar eru øktir 94% frá 1984-1988 at landsfyrisitingin er økt 90% hesi 4 árini, at mentan er økt 125%, og teir postar, sum eg nevndi, sum allir eru øktir umleið 100% tilsamans í miðal also tvífaldaðir kosta í dag umleið 1100 mió.kr.

Í hesum sama tíðarskeiði, somu 4 árini, hevur fiskivinnan fingið eina minkandi játtan soleiðis, at hon fær í dag 16% minni á fíggjarlógini, enn hon fekk fyri 4 árum síðan, sjálvt um hon er illa stødd. Farið inn á Skálafjørðin, og telji tær 100 tals mió.kr., sum liggja bundnar við bryggju, farið runt um í landinum, tey mest sosialistisku virkini liggja stongd og myrk, og ein kann loyva sær at spyrja, er slík sjón tekin um eitt sterkt búgv? Svarið er nei. Lesið frágreiðingarnar

almenna eiga sín rættvísa lut í samfelagságóðunum verður eingin javnvág. Slagsíðan í bagborði verður verri og verri.

Fólkaflokkurin hevur skotið upp tryggingarskipanir við uppsparing við skattafrádrátti, sum sjálvboðið hevði styrkt likviditetin úti í samfelagnum, hevði styrkt vinnulívið, hevði styrk einstaklingarnar og minka um tað almennu nýtsluna.

Harra formaður. Tað má vera tekin um at val er fyri durum, tá løgmaður nú knapliga er farin at harmast um vinnulívsmenn, sum eru útbløddir hvørs áræði nú er linkað. Vanliga verða vinnulívsmenn kriminaliseraðir, teir verða kallaðir spekulantar útnyttarar av samfelagnum, skatta-og umdómsstøkkarar, isoleraðir dansaðar um hin almenna gullkálvin. Men kanska geldur henda samkensla løgmans serliga ella kanska bara teir politiskt útvaldu reiðararnar, sum hava kastað seg upp í løgmans knúsandi farm, og síðan hava dansað sum valvandir cirkusartistar til floytu løgmans, meðan føroyska áskoðarafjøldin millum látur og grát hava øtast yvir henda politiska vinnusjónleikin, úrslitini eru eisini hareftir.

Hetta landsstýrið hevur beint fyri svartkjaftavinnuni eins og fyri farmavinnuni. Svartkjaftavinnan sýnist rættiliga beinleys fyri at brúka eitt fakmálburður í dag. Áðrenn landsstýri kvalir restina av vinnulívinum, átti ein nýtulig loysn at funnist fyri teirra virkir og skip, sum eru vorðin ein kleppur um beinið og ein ræðandi minnisvarði yvir almenna fiasko í vinnulívinum nú, tá sjálvt Gorbatjov er við at yvirhála Atla Dam í høgru síðu. Ja, gævi harra formaður, at hugurin at sosialisera var linkaður, tað er hann eisini í t.d. Burma, so hví skuldi hann ikki verið tað her?

Nei, vist er einki gildi ókeypis, men rokningina hava skattgjaldarin og vinnulívið goldið í 2 ár og halda fram at bløða, sum løgmaður tekur til, so leingi hetta landsstýrið situr. Løgmaður ætlar at lata sterkastu og breiðastu herðarnar bera samfelagsbyrðarnar, men eftir 4 ár av útbløðing, har tey sterkastu hava bløtt mest, eingin nevndur eingin gloymdur, og politiskt útvaldir vinnulívsmenninir royndust so illa, annars høvdu teir jú klárað seg sjálvar, tá er lítið at heinta og tá er lítið at leggja tær tyngstu byrðarnar á.

Umfordeilingin hjá løgmanni merkir jú, at einki samband skal verða í millum innsats og úrtøku longur soleiðis, at tey, sum duga at nýta ókeypis skipanirnar, har alt uttan at gera skyldu er ein mannarættur,

tey liva best, meðan fjøldin ið bert hevur sínar hendur, rygg og høvd at líta á verður brýnd niður av hækkandi livikostnaði.

Sosialistisk eyðnýtsla av samfelagsognini verður marknaðarført sum umsorgan og umfordeiling. Umfordeilingin fer fram á tann hátt, sum løgmaður sigur, at fordeilarar liggja væl undir lokinum á landskassanum uttan mun til, at tað stendur um húsbrot uttanfyri, sum tað also hevur gjørt nú í 2 ár og maktin, hon liggur í tí at sita fyri øllum og at sita á øllum. Solidariteturin hjá løgmanni røkkur bert til teirra, sum eru ideologiskt samd við honum. Sosialismin verður vrakað um allan heim, so lítið solidarisk er hon, hon er fultkomiliga ó nýtilig til annað enn at skaða tey samfeløg, sum royna hana, so gævi at hennara tíð var umbiðin 8. november her í Føroyum.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking)

Harra formaður. Tað er líka ein viðmerking til háttvirða løgtingsmann Óla Breckmann. Tá hann tosar um sosialismu, so kenni eg ongan so sosialistiskan ella so komunistiskan flokk sum Hin føroyska Fólkaflokkin. Teir mæla til at brúka óavmarkaðar nøgdir av peningi úr landskassanum til eitt privat vinnuliv, og eg trúgvi næstan, tað er har sum tað botnar. Nú í dag aftan á 4 ár viðganga teir, at íløgurnar eru ov stórar tað viðganga teir, men hvat segði formaður fólkafloksins also ikki stavnamaðurin, tá henda samgonga tók við og vit skóru nakað niður, tá segði hann, at hetta var deyðsiglarapolitikkur, men hvat sigur hann í dag, les Dagblaðið. Hann hevur skrivað røðuna í Dagblaðið, áðrenn hann hevur hildið hana, nú sigur hann, at íløgurnar eru stórar, nú viðganga allir flokkar, at tað er tann stóri trupulleikin, at íløgurnar eru ov stórar. Nú hava vit skip, sum fiska úr lastini hjá hvørjum øðrum, bert fyri at ugga hesar ymisku, sum skulu hava skip.

So tosar Anfinn Kallsberg eisini um, at hetta her fer at drepa iløguhugin við hesum her veghaldinum upp á 5%, men tað rætta var at viðtikið tað, at tað vóru bara fiskimenn, sum fingu skip, men hvat høvðu so fólkafloksspekulantarnir sagt, um bert fiskimenninir fingu skip. Handa har skipanin er í tí góða landinum hjá Poul Schluther Danmark, har hava teir hasa skipanina. So tosar hann so grúðuliga um, at nú skal hann gera pylsuna av hesi her dupultskattingini av siglandi føroyingum, jú, nú skal tann føroyski landskassin til at gjalda til tann danska

handilsflotan. Vit skulu tá sjálvandi avtaka skattin hjá teimum sum sigla niðri, tað er neyðugt harra Óli Breckmann, har missa vit 10 mió.kr. og hvussu nógv kanst tú bjarga aftur í land av hasum? Takk fyri.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking)

Harra formaður.

Tað knípir viðhvørt ella rættiliga ofta at skilja Fólkaflokkin. Nú var háttvirdi løgtingsmaður Óli Breckmann her uppi, hann málaði eina mynd av einum sundursorlaðum samfelagi, einum sundursorlaðum búskapi og samtíðis, so upplíva vit dag og dagliga, at onkur fólkafloksmaður rópar, vit skulu hava tunnil undir Vestmannasund beinavegin, og tá hann er liðugur at rópa, tá kemur eitt ekkó norðanífrá um kanningar og fyrireikingar av einum tunnli undir Leirvíksfirði beinavegin, og her mitt í landinum rópar ein triði, flogvøll á Glyvursnesi umgangandi fyri 1 mia.kr. og hasir tunnlarnir kosta eina hálva mia. kr. kanska hvør.

Also eg spyrji, hvussu hongur hetta saman, kann eitt samfelag sum er so út at koyra, sum Óli Breckmann hevur staðið her og greitt okkum frá, kann tað samfelagið byggja fleiri undirsjóvartunnlar og byggja ein flogvøll afturat? Also eg haldi satt at siga, at Fólkaflokkurin átti at farið heim og funnið síni egnu bein.

Eg eri púra samdur í at gera ein tunnil undir Vestmannasundi og samdur í, at vit eiga at siga sum so, vit hava ikki ráð at gera nakran nýggjan flogvøll nú. Hann skal vera har, tey fyrstu nógvu árini og tí gera vit ein undirsjóvartunnil, men samstundis, sum man tosar um tað so, í sama flokki at tosa um ein flogvøllá Glyvursnesi og tosa um beinanvegin at gera e undirsjóvartunnil tvørtur um Leirvíksfjørð, also eg skilji ikki at hasir menninir eru í einum flokki satt at siga.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður. Tað var til Heina O. Heinesen.

Vit mala ikki til óavmarkaðan pening úr landskassanum til vinnulívið, vit mæla bara frá at landskassin hevur óavmarkað atgongd at taka pening úr vinnulívinum. Vist hava íløgurnar verið ov stórar, tað siga vit glaðbeint, men ikki um ein kamb. Tað eru tær skeivu íløgurnar, sum mangan hava verið ov stórar, tað eru íløgur í óproduktiv endamál og tað er nýtslan hjá tí almenna, sum hevur verið ov stór.

Til framleiðsluendamál er altíð rætt at taka stóran til so leingi, sum placeringin av pengunum er góð, og nú veit eg

ikki, hvørja uppfatan Heini O. Heinesen hevur av löggávu viðvikjandi, hvør, ið skal fáa loyvi til at eiga skip, men var tað bara fiskimonnum loyvt at hava skip, so høvdu tey allarhelst verið í góðum hondum. Eg skal garantera æraða talaranum fyri, at ein hópur av føroyskum fiskimonnum í dag eru fólkafloksmenn. Teir plagdu kanska at vera tjóðveldismenn, tá fyrr í tíðini, tá ið Tjóðveldisflokkurin kanska hevði meira við veruleikan at gera, men síðan hann gjørdist ein fornleivd, eru flestu føroysku fiskimenninir vorðnir fólkafloksmenn.

So var tað til Vilhelm Johannesen. Tað er løgmaður, sum hevur tosað um eitt avskeplað lønarlag í Føroyum. Hetta, at tað er neyðugt hjá fagfeløgum at fara út til vinnulívið at krevja aftur tað, sum landskassin hevur lagt hald á, og tað verður gjørt ferð aftan á ferð við verkfalli oman á verkfall ár um ár, rokningin verður bara skrivað víðari yvir á vinnulívið, og tað er tað, sum ger tað rættiliga trupult at fáa nýggja framleiðslu á flakavirkjunum at bera seg til døgurðamat og annað inni á europæiska marknaðinum.

Vágatunnilin hann er sjálvfíggjandi og tað er kanska tann stórsta styrkin við tí projektinum, men eg kundi hugsað mær at sæð Vilhelm Johannesen farið norður til Klaksvíkar harra formaður og sagt fyri klaksvíkingum, at hann var í móti, at klaksvíkingar fingu frægast møguligt samband um Leirvíksfjørð, antin tað so verður við ferjum ella um tað verður við tunnli, tað má so framtíðin vísa.

Heini O. Heinesen (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Her ruggar ikki alt rætt hjá ti háttvirda tingmanninum Óla Breckmann. Hann sigur her, at tað er rætt at gera stórar íløgur í vinnulívið. Men so er tað spurningurín, hvar er rávøran til hesar íløgurnar, hvar er fiskurin, hvar eru kvoturnar, teir fiska úr lastini hjá hvørjum øðrum? Tað er tað, sum er galið, tað er ov lítið í part, tað er sum ein hagapartur, sum tú sleppur dupult so nógvum seyði í, sum hagin kann bera. Ein penan dag so er bara mold og einki gras at eta. Tað er har, tað liggur, og tað er tað, sum Fólkaflokkurin er við at gera, tað er soleiðis hann arbeiðir hasin flokkurin.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Eg skal svara Óla Breckmann stutt, at

Vilhelm Johannesen torir væl norður til Klaksvíkar at siga bæði við klaksvíkingar og norðoyingar, at nakar undirsjóvartunnil kemur ikki undir Leirvíksfjørð nú beinavegin, so mikið realistiskur eri eg, og so mikið realistiskir eru teir allar flestu norðoyingar og klaksvíkingarnir.

Tað má verða rættur politikkur at royna ein undirsjóvartunnil fyrst. Hvat kemur hann at kosta at gera? Hvat kemur hann at kosta at reka? Hvussu kemur hann at virka í rakstri? Verður hann tættur? Kemur tað at kosta nógv at halda hann tóman fyri sjógv? O.s.f. Áðrenn tað er greitt, er tað órealistiskt og vittleyst at tosa um at fara at gera kanningar og fyrireikingar til tann næsta undirsjóvartunnilin, lat okkum fyrst siggja royndirnar av tí fyrsta, tá skal eg taka støðu til tann næsta.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er væl nógv hent í Tjóðveldisflokkinum, síðan menn feraðust um alt landið, tað eru ikki meira enn eini 15 ár síðani og fortaldu fólki, at við Føroyar var eitt ótømandi ella eitt óavmarkað tilfeingi, tá vóru tað ikki stovnar meira, tá var tað tilfeingi.

Eg minnist væl at Øregaard av løgtingsins røðarapalli segði, at vit koma at arva ei bláðýpi, tá ið sjómarkið varð útflutt, sjálvandi var tað rætt og neyðugt. Vit sluppu ikki undan tí heldur at flyta sjómarkið út, tað, vit gjørdu. Men heima situr svøltandi kráka og tá ið nú tjóðveldismenn harmast um at fiska úr lastini hjá hvørjum øðrum og mæla frá stórum íløgum, so er tað ein rættiliga døpur gravskrivt yvir tann politikk, sum teir sjálvir hava verið við til atført hesi 4 árini, har ið stórstu skipaíløgur í fiskiskip, ið hvussu so er í Føroya søgu, eru gjørdar og skipini liggja flest øll bundin, trist nokk. Tað er púra rætt, tað er syrgiligt, tað er harmiligt, men tað er bara so og tað er also feil investeringar hjá Tjóðveldinum.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Nú tosaði eg ikki júst um hasi skipini, hatta har er ein nýggj vinna, sum man ikki kennir so nógv til, men tað vóru aðrar traditionellar vinnur, hvar ið vit vita, at flotin er nógv ov stórur. Hvar ið undanfarna samgonga við Óla Breckmann á odda økti munandi um veiðutrýstið, tað var tað, sum eg tosaði um.

Atli Dam (jv)

Harra formaður.

Eg vil takka Óla Breckmann hjartaliga fyri taluna, sum hann helt, hann er fantastiskur, tað má eg siga. Eg vil vóna, at hann so leingi, sum hann hevur sæti her á tingi, heldur nógvar slíkar røður. Tað er jú tað sum hjálpur okkum at halda Fólkaflokkin uttanfyri politiska ávirkan. Tí tað er neyðugt so leingi, sum tann maðurin teknar politikkin so nógv, sum hann ger.

Vit hoyrdu allar frágreiðingarnar um neyð og vesaldóm, um allar Egyptalands plágur, sum Føroyar eru plágaðar av. Vit fingu ongar loysnir, vit fingu ikki at vita, hvar tær liberalu loysnirnar eru ella tær borgarligu loysnirnar eru, vit vita snøgt sagt bara tað, at tað er troganin fram at landskassanum. So kann hann kalla og blaka, sum hann vil, um at aðrir eru óreellir, bert líka sínum o.s.fr.

Vit vita, at útgjarðingin úr landskassanum er vaksin og vaksin hvørja einastu fer, Fólkaflokkurin hevur havt høvi til at hava eitt orð at siga í Tinganesi. Tann almenna nýtslan er økt, hon er ikki minkað, skattingin er ikki minkað, og tað kundi hon sjálvsagt heldur ikki, tá ið tað skuldi nýtast so nógv til útgjaring.

Men burtursæð frá øllum hesum postulatum um útpining av vinnulívinum, so vita vit, at fólk hava tað gott í Føroyum. Vit vita, tað er prógvað, at her er hend ein munandi reallønarhækking, ja, so stór, at ráð er til eina økjandi nýtslu. So kann Óli Breckmann troysta seg so nógv, sum hann vil við at fiskimenn eru við at gerast fólkafloksmenn.

Tað var Henrik Old, sum tosaði um at skotta upp til ov stóran fong, og tað var Óli Breckmann, sum nú tosaði um skottfjalir sum máttu brennast tá man sigldi heim úr Hvíta havinum. Eg vænti, at tað verða nógvar og nógv uppskottaðar skottfjalir tøkar til at sigla fólkafloksskútuna til lands aftan á valið.

Adolf Hansen og Jógvan Sundstein klandrast eitt sindur um eina bjørn. Tað tykist sum Jógvan Sundstein, tá ið hann sigur, at tá ið vit koma í Tinganes, so skal landsbankalógin broytast. Tá Anfinn Kallsberg sigur, tá ið vit koma í Tinganes, so skal lógin um síðustillað veðhald frá bankum, áðrenn skip verða játtað, broytast. Eg trúgvi, at har verður lítið at frøast yvir.

Tað varð tosað nakað um politiskt fríggj, onkur vildi verða við, at javnaðarmenn og sambandsmenn vóru farnir at fríggja. Eg havi ikki lagt merki til tað, men vit hava

merkt okkum, at tað eru ógvuliga fáirm, sum fríggja til Fólkaflokkin, ógvuliga fáir. Tað eru nakrir heilt fáir tjóðveldismenn, sum hava tíkist við tað. Hergeir Nielsen fegnaðist um, at har hevði ongantíð verið nakað samarbeiði fyrr, hóast vit minnast á sinni Zakaris Vang róði uppundir, og hóast vit vita, at Finnbogi Ísakson rør uppundir, ja er enntá ikki bangin fyri at taka Sambandsflokkin upp í eitt samarbeiði ella Fólkaflokkin, men reelt sæð, so trúgvi eg, at tann politikkur, hatta slagið av røðum, sum Óli Breckmann hevur gjørt seg kendan fyri, tær hava verið medvirkandi til, at flokkurin í nógv ár enn ikki verður fúsur ella førur fyri at taka lut í stýrinum av samfelagnum.

Tað er greitt, at ein vissur vandi liggur í tí, sum Anfinn Kallsberg vísti á, at bert stór feløg ella virkir kunnu ogna sær skip, tá ið veðhaldini verða minkað, og tá ið eginpeningskrøvini verða hildin meira, ella man roynir at halda tey meira til lógina. Hendir tað, so er greitt, at man má broyta, og tað er helst so, at allir flokkar vilja ásanna at neyðugar broytingar skulu gerast, um vit koma í tann vanda, at vit ikki fáa endurnýggjað okkara kapitaltól, okkara vinnulívstól. Men eg haldi nú ikki, at tað ger nakað, at vit hava eina tíð n[illegible] í nøkur ár, tí vit hava nóg mikið av umsóknum um at fáa skip nú í nøkur ár, hvar ið roynt verður at føra ein nakað varnari politik hesum viðvíkjandi, hvar man fær peningaverðina, bankaverðina til í størri mun at koma upp í vurderingarnar av projektum og at taka lut í risikoini viðvíkjandi projektum, og tað koma teir at gera, tá teir koma at liggja aftast við 5%, og har yvir væl í ávísan mun skulu taka risiko av rakstrarlánum o.s.fr. So eg trúgvi ikki, at tað er so galið. Eg haldi tað er alt ov tíðliga at programmera, at tá vit koma út í Tinganes, so skal hatta broytast. Tað verður kanska ógvuliga drúgt at bíða hjá teimum, sum hava brúk fyri broytingum.

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Tá ið løgmaður lýsti eftir liberalum loysnum, so kann man, ið hvussu so er siga, at tað er ikki ein rætt loysn, og yvir høvur ikki liberal loysn at pumpa eitt lønarlag í einum samfelag, sum hevur eina einastu høvuðsvinnu, fiskivinnuna, við skatti og avgjøldum til tað almenna soleiðis, at lønarlagið verður avskeplað og ger kostnaðarlagið vónleyst

ókappingaført í hesum samfelagnum, tí fyrr ella seinni, má rokningin fyri alment marglæti koma til fiskivinnuna, hon má sendast útflutninginum soleiðis, at ein dekningur fyriliggur, serliga tá okkara vinnulív er vorðið so mikið meira viðbrekið og einstáttað aftaná, at farmavinnan varð send á húsagang. Tað hevur verið tosað nokk so nógv um úrslitið av einum vali. Løgmaður hevur ein ávísan hug til at selja skinnið, áðrenn bjørnin er skotin. Eg haldi, at ein átti at bíða til valið er av, fyri at síggja, hvussu úrslitið verður, tí ein og hvør samgonga aftan á valið, verður skipað eftir ti tingmannatali, sum er aftan á valið, og vit hava sæð, at Javnaðarflokkurin hevur fríggjað til sambandið, tað er jú heilt upplagt og orsøkin er ein einasta ein, tað er tað, at Sambandsflokkurin er vorðin so mikið lítil aftur nú, at Javnaðarflokkurin kann taka leiðsluna í eini slíkari samgongu, og kenni eg seinasta løgmann rætt, so fær Javnaðarflokkurin leiðsluna. Tí hann hataði einki meira enn at sita við ábyrgd, tann løgmaðurin. Og tað verður helst lætt at fáa Sjálvstýrisflokin við eisini í ta samgonguna, og kanska onkran annan. Men skal tað verða okkara største deyðsynd, at vít eru vorðnir líka stórir, sum Fólkaflokkurin, so haldi eg, at vit tora at taka ta skuldina upp á okkum. Tí tað verður ikki við at vera undirbrotligur fyri Javnaðarflokkinum, at vit fáa tað ávirkan, sum er neyðug fyri at hetta her samfelagið skal kunna verða borðbært aftur, tað verður bara við, at vit verða so mikið sterkir, at tað verður Javnaðarflokkurin, sum situr uttanfyri, tað kláraðu vit í 1980 og um umstøðurnar verða tær somu aftur, so skulu vit klára tað eina ferð aftrat. Lít á tað, harra løgmaður.

<u>Atli Dam</u> (jv.) viðmerking

Eg haldi nú annars tað hava verið fólkafloksmenn, sum higartil í dag hava selt skinnið áðrenn bjørnin varð skotin Óli Breckmann. Samfelagið er borðbært, trupulleikin er, at Fólkaflokkurin í 1980 gjørdi seg sjálvan soleiðis, at hann ikki var borðbærur. At menn kortini troystaðu sær í samgongu við henda flokkin, tað var nokk so specielt, haldi eg. Eg hevði varhugan av, at mín undanmaður í hesum starvinum seinast, var rættiliga nógv kroystur fyri at fara út har saman við tí flokki og aftan á, at hava roynt tað, haldi eg ikki, at hann hevur spart upp á at programmera hvussu lítið brúkiligur hesin flokkur er. Eg skal minna á, at søgan kann

endurtaka seg.

Í 1957 tapti Javnaðarflokkurin eitt fólkatingsval, og ein fólkafloksmaður tók sætið á fólkatingið. Teir vóru sjálvsagt sigursælir til tað komandi løgtingsvalið, sum var árið eftir, tað var løgtingsvalið í 1958, tá ið Javnaðarflokkurin fór 3 menn fram.

Óli Breckmann (ff)

Harra formaður.

Tað er heilt týðuligt, at tað verður fríggjað til Sambandsflokkin frá Javnaðarflokkinum, tað er ikki annað enn, hvat vit hava sæð fyrr í søguni, og tað sær út til, at javnaðarfloksins treyt fyri, at taka ein flokk í samstarv er, at flokkurin er undirbrotligur og letur seg stappa í lumman av Javnaðarflokkinum, tað er so ein treyt, sum onkur kanska vil ganga undir, men tað skal verða løgið, um ein flokkur ikki skal hava annað politiskt mál at stíla fram í móti fyri at fáa ávirkan enn, at hann skal gerast minni enn Javnaðarflokkurin, tað er meiningsleyst.

Eg veit eisíni um eitt annað fólkatingsval, tað var fólkatingsvalið í fjør, harra løgmaður, tá ið Atli Dam varð valdur niður í fólkatingið, tað er ikki neyðugt at fara 30 ár aftur í tíðina, fyri at tosa um fólkatingsval, vit kunnu gott fara til 8. september í fjør, og so gingu 7 mánaðir, og tá so eitt fólkatingsval kom aftur at, tá var Atli Dam ikki longur valdur í fólkatingið.

Atli Dam (jv) stutt viðmerking

Danskararnir hava eitt orðafelli, sum sigur, at 10-oyrað fellur við hvørt eitt sindur spakuliga, men um vit royna einaferð afturat, so kanska tað fellur í 5-oyrum ella 1-oyrum.

Eg skilji, at Óli Breckmann skilti ikki rættiliga samanberingina. Eg visti til júst tað, at Javnaðarflokkurin hevði ein mann valdan á fólkating, misti hann nakað seinni, og so kom løgtingsvalið.

Fólkaflokkurin fór niður á 5 menn í 1958 aftaná, at hava vunnið eitt val í 1957, men vit sóu at kurvin fór niður hesar 7 mánaðarnar, so tað er møguligt, at hann longu er á veg har níur.

Nú kann tað verða, at hetta tykist lurtarunum sum nakað av arging, men eg haldi, hetta her sigursæla fólkafloksprátið um, hvussu teir skulu gera, tá ið teir koma út í Tinganes, tað ger, at tað treingir til, at man minnir Óla Breckmann á, hvat er hent fyrr í søguni. Tá ið Javnaðarflokkurin misti ein fólkatingsmann, tá vann hann størsta sigur til løgtingsvalið aftaná.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað man falla mongum tungt at fáa tað 10 oyrað upp á plass, tá tey verða biðin um at skilja, at besta vón, sum Javnaðarflokkurin hevur til løgtingsvalið komandi er, at teir vunnu næst síðsta fólkatingsval og taptu tað síðsta. Eg trúgvi, við teirra besta vilja er tað vónleyst hjá fólki at skilja, hvat tað er, sum løgmaður meinar við.

Flemming Mikkelsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er ein viðmerking til Óla Breckmann løgtingsmann. Hann tosar óført um, at tað verður fríggjað til hvønn annan og hann tosar eisini óført um, hvør ið hevur manna Tinganes, og hvør ið kemur at manna Tinganes og hevur torað at taka við ábyrgd og ikki vilja sita við ábyrgd. Men eg skal garantera fyri, at um Fólkaflokkurin fær 17 mans eftir valið, so verður Óli Breckmann ikki at finna í Tinganesi.

Atli Dam (jv.) viðmerking

Bara fyri at fáa tað upp á plass. Sjálvsagt byggir Javnaðarflokkurin ongan politik upp á slíkar fantasiir um, hvat er hent eitt undanfarið valskeið, men Javnaðarflokkurin byggir sína optimismu upp á, at hann tey seinastu 28 árini hevur havt leiðsluna í Tinganesi tey 20 og hevur kunnað lagt eitt samfelag til rættis, sum er gott at liva í, at hann framvegis fram um aðrar ikki missur vónirnar og framvegis metir seg eiga loysnirnar, ein slíkan politik skilja fólk og tey seta sær vónir har eftir. Tí vænti eg, at tann stóri fongurin, sum Fólkaflokkurin hevur væntað sær, ja hann verður ikki at fáa hesuferð.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Nú hevur verið so nógv tosað um fríggjarí, og summir hava verið nokk so upp østir her. Tað, sum manglar í fyrí at fáa eina samgongu í millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin, er jú bara tann eini maðurin, og um hann ikki verður afturvaldur, so er tann samgongan klár. Eg trúgvi, at teir eru nokk so samdir eisini teir báðir flokkarnir í ymsum sjónarmiðum, serliga í teimum sosialistisku eru teir rættiliga samdir. Men so er tað úttalilsi, hjá beiggja, tí fyrrverandi løgmanni Paula Ellefsen. Svend Age sigur, komandi løgmaður eitur Jógvan Sundstein so hann hevur úttalað

at vit ikki hava ráð til so nógvar flogvøllir, so har er okkurt í ger.

Pauli Ellefsen (sb.)

Harra formaður.

Atli Dam løgmaður segði í áðni, at hann ikki hevði merkt til nakað fríggj nú í heyst, men tað hava vit, also vit hava merkt til fríggj frá ymsum síðum og sjálvt Hergeir Nielsen fordjúpaði seg í tí møguleikanum, sum enn ikki er roynður, nevniliga ein samgonga millum Tjóðveldisflokin og Sambandsflokkin og út frá tí, sum Atli Dam var inni á, at eg og vit í 1980, eg vil ikki siga vórðu lokkaðir inn í nakað, sum vit ikki vóru so ógvuliga glaðir fyri, so ætlaðu vit at kanna nærri, um hesir flokkar hava reellar ætlanir, áðrenn vit reagera.

Harra formaður. Nakað, sum Óli Breckmann segði í áðni, fekk meg at hugsa um vandan fyri globalum trafikkaos, tí hann týðuliga sá fyri sær, at Gorbatov yvirhálaði Atla høgru megin, og vit eru nógvir sum síggja ógvuliga klárt fyri okkum, at Ronald Reagan stríkur fram við Óla Breckmann vinstrumegin, og um tað ikki kann geva politiskt ferðsluóhapp, so veit eg ikki, hvat tað kann.

Í fyrsta umfarinum hjá mær, gav eg eina sakliga viðgerð av uøgmansrøðuni og vísti á, teir nógvu feilir, sum vóru við henni, tað skal eg ikki endurtaka. Eg gjørdi eitt sindur nógv burtur úr búskaparligu gongdini í teimum stóru linjunum og eg haldi, at vit hava upplivað ein mann, sum síðan eg var uppi, ella havi sæð tað, ið hvussu so er, hevur givið okkum fulkomiliga rætt, sum hevur avsannað konklusiónina og samantakið hjá løgmanni nevnliga tann nýtilnevndi stjórin fyri landsbankan. Hann sigur, at búskaparliga gongdin og støðan hjá Føroyum hava verið góðar, men nú er neyðugt við tiltøkum, og landsbankastjórin er sanniliga ikki hvør sum helst, hann hevur skil fyri økonomi, tað vita vit, og tað er ein váttan av tí, sum vit hava ført fram. Tað, sum stendur eftir alt týðuligari og tíðiligari eisini aftan á hesa viðgerð, tað er, at tann samlaði vinningurin hjá Føroyum, tann samlaði vinningurin uttan í frá útflutningsvirði er minkaður undir hesi samgongu, so kann man fara í smálutir, júst sum man vil, men tað endaliga úrslitið, tað samlaða úrslitið, er, at vinningurin hjá Føroyum, av framleiðsluni er minkaður ?? uttanífrá, harumframt hevur man tryggjað sær, at statsstuðulin, sum fyrr hevur vaksið nokk so nógv, nú stendur í stað og

eisini fer at minka. Tá man frá samgongumonnum kortini roynir at billa fólki inn, at alt er ljósareytt og alt gongur fint, so haldi eg, at man ger eina roynd, sum undir ongum umstøðum fer at eydnast, tí veljarin er ikki so býttur, tað er, ið hvussu so er, mín meining.

Sum eg segði, man kann saktans fara í smálutir. Atli Dam var inni á farmaskipunum og sigur, at tey áttu ikki livilíkindir. Har kann eg endurtakað tað, sum vit hava sagt frá okkara síðu. Tey áttu ikki livílíkindi fyri tann keypspening, sum varð givin fyri tey, men landsstýrið setti tá eina stóra serkøna nevnd, hon var so stór, at hon kundi minst manna eitt farmaskip, ið hvussu so er tálið. Henda nevnd hevði til uppgávu at finna út av, hvussu stóra skuld hesi skipini kundu tola framyvir, og har vóru serliga kalkulatiónir frá A.P. Møller, sum vóru grundleggjandi og teir sigast at hava skil fyri slíkum. Veruleikin er, sum vit hava sagt fleiri ferðir, at vit kundu ikki umganga tap, men munurin á okkara sjónarmiði og samgongusjónarmiðnum var, at tá tapið varð konstatera, skuldu vit bera so í bandi, at skipini framvegis vóru í Føroyum, tað var tað, sum vit vóru ósamdir um. Skipini fóru til danir og týskarar.

So kemur løgmaður inn á svartkjaftaveiðuna og vísir á, at landsstýrið hongur max 20% upp á hesi svartkjaftaskipini, sum liggja spjadd inni á Skálafjørðinum. Eg eri nú ikki vísur í at hetta er rætt, um man kannar rættiliga eftir, tí mær vitandi hongur landskassin sera tungt uppá, ið hvussu so er eitt undir gerð, og okkurt annað, sum ikki er svartkjaftaskip, eisini undir gerð, so hatta har var at fara eitt sindur lætt um sannleikan, men lat tað fara. So sigur løgmaður frá úrslitunum av hesum íløgunum og har nevnir løgmaður eitt ov lítið tal í íløguni, men úrslitini eru fantastisk. Vit kunnu gera produktir, hann nevndi eini 4-5 ymisk produktir ella 6. Og veruleikin er jú, at hesar roynðirnar kundu havt verið gjørdar umborð á teimum skipum, sum vóru framan undan, tí stendur eftir, at íløgurnar vóru óneyðugar, tær vóru óforsvarligar út frá teimum upplýsingum, sum fyrilógu og

tær vóru óneyðugar. Eg haldi tað, at fara og royna at siga fólki frá, at tær íløgurnar, ið tey skip sum nú liggja bundin við bryggju inni á Skálafjørðinum aftan á at vera farin á húsagang, summi fleiri ferðir, at tað er nakað, sum man veruliga eigur rós uppiborið fyri frá veljaranum, tað haldi eg er at ganga sera langt.

Eitt annað mál, sum hevur verið nógv umrøtt her, serliga av Hilmari Kass, tað er hetta við eginpeningi í farmaskipum. Nú hevur Hilmar Kass sagt fyri fjølmiðlunum, at hann tímir ikki meir at sita á tingi, tí hann tímir ikki at avgera, hvør skal fara á húsagang og hvør, ið ikki skal. Tað havi eg, ið hvussu so, er hoyrt, hann skal hava sagt. Har má eg siga tað, at tað skilji eg væl, tí so væl hevur hann hevur tímað nevnliga at fingist við hetta problemið, so skilji eg væl, at hann er vorðin móður. Man kundi nevnt Gullfinn t.d., sum enn ikki er farin. Og hann hevur fleiri ferðir í hesum orðaskiftinum eisini verið inni á undanfarna landsstýri, tá talan er um eginpening. Eg haldi at kjakið um eginpening hevur verið ov ósakligt. Tí veruleikin er, at tá vit tóku við, var einki eftirlit av nøkrum slagi við, um eginpeningur var til ella ikki, tað er ein veruleiki. Tað einasta og største kravið, man kundi finna upp á at stilla í summum førum, tað var um 10% stóðu kontant inni á eini bankabók, og tað nýtist mær ikki at siga tingmonnum, at tað er ógvuliga lætt at fáa nakrar pengar inn á eina bankabók, ið hvussu so er fyri ein ella tveir dagar. Tí gjørdu vit av at royna at stramma hesar reglurnar.

Vit søgdu, at um ein maður kemur og skal keypa skip skal hann hava eginpening upp á 10%, so skal hann veragóður fyri tey 10%, hann skal eiga tað, hansara ognaruppgerð skal vísa mirst 10%. Og vit gjørdu nakrar reglur, og hesar reglurnar vórðu strammaðar í figgjarnevndini. T.d. í globalskipunum, tá forlangaði figgjarnevndin, at hvør maður, sum teknaði 50.000 kr., skuldi endavendast, kannast høvd og garnar, alt skuldi kannast hvussu góður hann var, og tað varð eisini gjørt. Embætismenn sendu boð eftir ognaruppgerð. Og hetta er einasti máti at kanna, um eginpeningur er til. So var tað vanligt tá, og tað

varð biðið um frá figgjarnevndini, um man ikki kundi síggja hesar menninar, og tað var vanligt at hesir menninir møttu upp í figgjarnevndini. Eg havi hoyrt at, teir vórðu krossavhoyrdir av andstøðuni um øll teirra viðurskifti bæði um skipini, og hvussu tey vóru hvussu eginpeningurin var o.s.fr. Vit søgdu frá landsstýrinum, at tað eru tað fínar greiðir, so fáa teir fyrstu honds vitan um hesi her viðurskifti. Nú sigur Ivan Johannesen fyri okkum, at hjá honum hevur gingið illa at fingið at vita, hvør eigur tey skipini, sum eru komin, hesi her árini. Og tað er tað, sum fellir mær eitt sindur tungt.

Jú, so kundi eg nevnt at umframt, at man hevði eina velduga kanningarnevnd til at kanna eginpening, so hevur man eisini forlangað, at kriminalpolitiið skuldi koma til Føroyar og fara eftir hesum her privatmonnunum, tað er sagt mær, ið hvussu so er, eg kenni ikki úrslitini av hesum her, men tað, sum eg kundi hugsað mær at spurt, og eg havi gjørt tað í mínum fyrra innleggið, tað er, er tað rætt, sum eg havi kensluna av, at man hevur aftur slakað upp á eginpeningskanningarnar? Er eftirlitið ikki minkað undir hesum landsstýrinum í mun til tað, sum vit royndu at gera tá? Er tað veruliga soleiðis, at menn hava mist pengar av hesum skipunum? Er nakar eginpeningur mistur, sum er skotin inn av veruligum peningi? Tí tað má man geva globalmonnunum tíverri, at teir fyri tað fyrsta vóru góðir fyri nógv meir enn 10% av eginpeningi ella 10% av keypspeningi, men harumframt hanga teir upp á nógv meir enn 10% av eginpeningi.

Spurningurin er, hvat hava hesir menninir mist, sum eiga ella sum áttu henda svartkjaftaflota sum nú liggur bundin við bryggju farin á híusagang tvær ferðir, summir, ið hvussu so er. Eg sigi hetta ikki fyri at fara eftir privatmonnum. Tí eg haldi, at allur tónin líka frá tí fyrstu løgmansrøðuni, hvar ið løgmaður segði, nú skulu vit finna nakrar aðrar til at umsita samfelagsins ognir, og so valdi man nakrar menn út. Og um teir hava tikið í móti skipum upp á nokk so lagaligar treytir, so kundi eg ongantíð droymt um at fari og kritisera teir fyri tað. Eg sigi meg ikki betri enn so, at um løgmaður kom og bjóðaði mær eitt, so veit eg ikki, um eg hevði kastað tað aftur. Tað er klárt, at her er tað ábyrgdin hjá politikkarunum, um man hevur mist tamarhaldið og um man

hevur latið verða við athildið fram við tí eftirlitinum av eginpeningi, sum vit royndu at gera.

Harra formaður. Eg haldi, at eg skal steðga, eg siggi at tíðin er farin, men eg siggi á Atla Dam og Hilmari Kass, at tað er rætt av mær at biðja um orðið eina ferð afturat.

Henrik Old (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Nú hoyrdu vit aftur søguna frá Paula Ellefsen um hetta her, at man skal ikki forfylgja privatmonnum, tá tað kemur til eginpening.

Eg trúgvi, tann einasti føroyingur, sum er komin inn á at forfylgja privat persónum, var Pauli Ellefsen. Hann forfylgdi privatmonnum í Vági inn til tað allar allar ítasta við tað at hann á forsíðuni á Dimmalætting systematiskt jarðlegði nakrar menn í Vági, sum áttu eitt skip, ið teir róptu fyri Skrokkin. Eg haldi, tað kann ikki verða eitt mansbarn her á landi, sum ikki kennir tað skipið, hvussu tað varð forfylgt av einum manni, sum bjargaði sær tingsessin upp á tað, tað er 100% vist tað vita øll. Og so kemur sami maður upp og sigur, at man skal ikki forfylgja privatpersónum. Har er litt skúladømi um, hvussu man kann forfylgja privatpersónum til teir liggja skerflatir.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Nú vita tey flestu, at tað varð eitt sakarmál burtur úr tí málinum og á forsíðuni á Dimmalætting er tað refererað, sum fór fram í dómhúsinum, tá ið tómur skuldi falla, men ikki fall. Og tað sum gjørdist úrslitið, var tað, at mínar atfinningar høvdu ikki gingið í móti einum privatmanni, men tær høvdu gingið í móti politikkarunum, sum sótu tá. Tá Henrik Old fastheldur, at eg bjargaði mær tingsessin tá, so vil eg bara viðmerkja, at orsøkin til, at eg tók tað málið upp var, at eg var limur av fíggjarnevndini, og at eg tordi ikki serliga við mínari fagligu útbúgving at lata vera við at koma alment fram við tí, tað var orsøkin.

Hilmar Kass (sj.)

Harra formaður.

Nú hevur Pauli Ellefsen so ofta tosað um eginpening og tær sjálvsmótsøgnir, ið verið hava. Vit eiga at minnast til gongdina, áðrenn vit fingu farmaskipini.

Tað var løgmaður Pauli Ellefsen, sum tosaði við okkum

samgongumenninar um at broyta lógina soleiðis, at tað kundi fáast bæði stuðulslán og veðhald til at byggja farmaskip fyri, tað var munandi ov stórt.

Vit vóru nakrir kanska serliga eg, sum vóru sera ivasamir um hetta var rætta leiðin at ganga, men eg havi fulla ábyrgd, tí eg slakaði fyri táverandi løgmanni og atkvøddi fyri hesi lóg.

Ná,so var tað Grannskoðaravirkið Pauli Ellefsen, sum setti rakstrarætlan upp fyri hesi skip. Tey komu so til viðgerðar bæði í samgongu og í løgtingi og seinni kom eisíni okkurt annað grannskoðaravirki, men fyri uttanlands var tað nú mest bara grannskoðaravirkið hjá Paula Ellefsen .

So var tað løgmaður Pauli Ellefsen, sum viðgjørdi hetta í landsstýrinum, fekk tey samtykt og komu tey so fyri figgjarnevndina og figgjarnevndin trúði, at tað var nakað hald í hesum tølum, sum vit fingu til viðgerðar, tí vit hava hoyrt, at Grannskoðaravirkið Pauli Ellefsen og nú fortelur hesin sami maður við sína fakligu útbúgving sjálvt um hann sæt sum løgmaður, so hevði hann møguleikar at meta um, hvussu var nú hetta her, sum kom fyri figgjarnevndina. Síðan varð hetta samtykt, og vit hoyrdu eisíni henda mann her á røðarapallinum, siga, at tað var eingin vandi at fáa hesi skipini, hann kundi selja tey bæði fyri 100 og 120% av tí, tey kostaðu.

Vit vita, at hesi skip høvdu ikki søluvirði meira enn millum triðing og helvt av tí, tey kostaðu, tá tey einaferð komu í vinnu. Vit hava eitt dømi um tað síðsta skipið, sum kom, tað kostaði 140 mió.kr., men hevur kunnað fingist fyri ca. 50 mió. kr. Eg veit einki um, at tað er selt tann dag í dag. Hetta er maðurin og álitismaðurin Pauli Ellefsen, sum nú veit, hvussu ið henda samgonga skuldi loyst henda sama spurning.

Tá vit so koma inn til eginpeningin, so minnast vit øll tað, ið Henrik Old beint nú nevndi, hvussu Pauli Ellefsen ferð eftir ferð førdi fram, at her var eitt skip selt fyri meira enn tað, tað veruliga var vert og hetta var tí óreellur eginpeningur. Tí var tað eingin ivi hjá mær, tá tað nú var hesin maður sum hevði ábyrgdina í landsstýrinum og skuldi tryggja sínum samgongumonnum, tryggja figgjarnevndini, at tann treytin, ið sett var 10% eginpeningur skuldi vera tøkur, tá ið skipini komu í gerð ja, tað var hildið fult út, men so var ikki.

Vit hava hoyrt um lán, og her er tað, at Pauli Ellefsen heldur fram við at tosa um, at tað var kannað, hvat hesir menninir áttu. Eg dugi ikki at síggja, tað hevði nakran

týdning, um hesir menn áttu 1 mió.kr., 10 mió.kr., ella teir einki oyra áttu, tað verður tosað um eginpening her, tá teir ikki heftu fyri teimum lánum, ið nýtt vórðu til eginpening, so hatta er fullkomiligt tos uttanum.

Tað er rætt, at tað eru nógvir, sum hava bløtt í hesum leiki og tað er tað allar harmiligasta av øllum, tí eg eri sannførdur um, at tey fyrstu global skipini vístu eitt so ringt úrslit, at tá ið menn fóru út og fingu fólk frá hond at skriva undir og seta pengar ja, ikki seta pengar bara skriva undir og skriva undir fyri at verða við. Teir hava tosað í móti betri vitan. Her var ein rúgva av fólki lokkað at geva eina undirskrift upp á ein part í einum partreigarfi, og eg eri ógvuliga bangin fyri, at rættiliga stórur partur av teimum, ið har skrivaðu undir, ikki kendu, hvørjar fylgjur, tað kann hava at binda seg sum partaeigara, men tað var har, ið fólk komu at bløða, tað var ikki í partafeløgunum. Tí har hava vit fingið at vita, at tað var bara ein lítil partur av tí peningi, sum skuldi av teimum 10% og at tað ikki var løgmanni heilt óvitandi, tí eg frætti á gøtuni um, at hetta her var nakað, sum ikki var í lagi og eg bað løgmann klárt og greitt fleiri ferðir kanna, um tað var nakað í hesum tíðindum, sum gingu á gøtuni at tað var bara ein lí. il partur av reellum eginpeningi, restin var lán. Eftir síðan er tað komið týðuliga fram, at ein stórur partur var lán, eitt lán, sum eigararnir als ikki heftu fyri, og tað vil eg siga er als ikki reellur eginpeningur, og tað loyvi eg mær at siga, sjálvt um eg ikki havi ta fagligu útbúgving, hvat viðvikur fíggjarviðurskiftum og tílíkum tølum, sum Pauli Ellesen hevur.

Her er skift band so ein partur av viðmerkingini hjá Óla Breckmann er burtur.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

og sum hevur verið við til at fingið skipini tvingsilseld. (avbrotið)
tí tað nyttar einki nú at standa her, tá man situr í eini nýggjari samgongu, og geva løgmanni í undanfarnu samgongu skuldina fyri, at skipini komu soleiðis fyri, sum tey komu, tað er tað sum mær ikki dámar við hasum málinum. Takk fyri.

Sverri Midjord (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var tinglimurin Óli Breckmann, sum segði tað, at Global skipini nú

kunna sigla við yvirskoti. Men er tað ikki so at Global skipini nú eru komin niður á tann prísin, tey veruliga skuldu havt, tá tey komu til Føroyar. Hvør er tað so, sum hevur vunnið pengar upp á hetta her Óli Breckmann, tað má verða ein ella annar, tí at í dag hevði Asbjørn Joensen eitt skjal frá Fólkatinginum, har frárátt var at fara undir fraktævintýrið, sum eg tíverri má kalla tað, og tað vóru fólkatingslimir hjá føroyingum vitandi um og sami fólkatingslimur vóru limur av samgonguni, sum fór undir hetta tiltakið, sum kostaði nógv meira enn tað skuldi. At bátarnir í dag bera seg Óli Breckmann, tað er einki at ivast í, tí í dag eru teir á tí prísi, teir skuldu havt frá uppruna av.

Hilmar Kass (sj.) viðmerking

Tá ið tað nú av Óla Breckmann, verður tosað um, at vit hava latið skipini fara á húsagang, so kundi eg skilt hann. Eg havi ofta hugsað, er hattar ein kommunistur, ið her tosar, ella er tað ein sosialistur? Eg trúði tann tíð tað var, tað er nú nokk so langt síðani, at Fólkaflokkurin var ein liberalur flokkur, at hann var ein borgarligur flokkur. Og tað er tí, at eg vísi á, at eg mangan verði lagdur undir at skula verða fyri at fáa alt á húsagang, men tað løgnasta er, at eg av borgarligum flokkum, at eg av liberalum flokkum havi verið lagdur undir at koyra skip á húsagang, tí at landið ikki av nýggjum hevur koyrt hundraðir av miliónum í hetta her, men tit siga ikki hvør ið eigur tað. Og so er spurningurin, er tað so landið, sum skuldi átt skipini aftan á aftur og rikið tey, ella er tað landið, sum av nýggjum skal aftaná, at menn hava vist, at teir ikki hava havt skil fyri teimum røttu íløgunum, skal koma við ovurhondspeningi, áðrenn skipini koma niður á tað, tey kunnu forsvara í vinnu í kapping við onnur lond.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var Sverri Midjord, sum spurdí meg, hvør mundi hava vunnið pengarnar av hesum skipunum, sum vóru dýr. Eg vóni, at teir sum hava siglt við, hava vunnið nakað av pengum. Teir, sum hava staðið fyri skipunum uppi á landi, hava væl eisini fingið sína løn.

Eg havi skilt á lagnum, at tað eru nógv fleiri pengar mistir, enn vunnir tíverri av fólki, sum kanska heldur ikki hevur so nógv at rutta við. Tey mistu sínar sparipengar og hava

kanska fingið rokningar omaná. Tað er slíkt, sum hendir, antin skipið eitur Global, ella tað eitur Raðhamar ella Olaf í Garðastovu.

Tá so Hilmar Kass spyr meg, hvør skuldi átt skipini aftaná, at tey vóru seld, ja so er tað væl ein spurningur, sum man kundi havt tikið støðu til aftaná, at man hevði vist ein politiskan vilja til at átt skipini í landinum, og tað er tað vit tosa um. Tað er ein spurningur, um man vil lata skipini fara og at missa bæði toppin av íløguní og kapital-apparatunum also omaná also inntjeningsorkuna. Skaðin liggur í tí, at vit hava mist ikki tær fyrstu 40 mió.kr. men at tær seinastu 50 mió.kr., eru farnar. Tí um skipini stóðu i 50 mió.kr., tað hevði saktans borið til at fingið menn at tikið seg saman til at átt skipini. Eg haldi eisini, at tað vóru royndir gjørdar, sum høvdu stovnað nýggj feløg, men tey fingu so ongan kjans, tí hetta landsstýrið valdi at lata onnur fáa skipini fyri 50 mió.-kr. heldur enn at lata føroysk feløg fáa skipini, og tað er tað, vit hava funnist at, tað er tað vit harmast um.

Sverri Midjord (jv.) viðmerking

Eg skilji tað, at Óli Breckmann hevði helst gingið við til at sosialisera skipini, eftir tí, sum hann er komin til nú, tað er tann niðurstøða, Hann sigur, at man kundi gott snakka um tað, tá ið man hevði komið á botn í hesum málinum, men veruleikin er tann, at nú kanska eg eri nakað tornamur, eg dugi ikki at skylja borgarligan/-liberalan politikk, tí hann er langt uttan fyri tað, sum eg meti at verða ein sosialistiskan politikk.

Atli Dam (jv.) viðmerking

Tað var forvitnisligt, at Óli heldur ikki hesa ferðirnar kundi síga nakað um, hvussu ognarviðurskiftini skuldu havt verið viðvíkjandi hesum skipum.

Tað passar ikki, sum Óli Breckmann sigur, at skipini høvdu borið seg fyri 50 mió.-kr. Skipini vórðu seld fyri 40 mió.kr. stk., tá vit tosa um Global bátarnar tað sama tilboðið, sum føroyingar góvu, men sum peningastovnarnir ikki vildu lata tey fyri til føroyingar aftur. Tað passar ikki, at tað eingin politiskur vilji var til at eiga skipini, men tað passar, at tað ikki var vilji til at pumpa 100 tals av mió.kr. aftan á tær mió., sum vóru farnar.

Tað verður sagt bæði av

Paula Ellefsen og Óla Breckmann, at tá ið tapið varð konstatera, so skuldi vit havt varðveitt skipini, men teir vilja ikki viðurkenna, at so skuldu vit havt goldið fleiri 100 mió.kr. afturat teimum 150 mió.kr., sum tapið nú gjørdist og kortini høvdu vit eingi føroysk arbeiðspláss burtur úr hesum her og helst var eingin møguleiki fyri, at tey kundu verið verandi undir føroyskum flaggi. Eitt internationalt skipsregistar kann ikki hava nakra meining hjá Føroyum.

Onnur lond, sum hava ráð til at frítaka ein so stóran part av skattgjaldarunum fyri skatt, tey kunnu kanska loyva slíkt fyri at fáa nakað av valutainnsigling, fyri at fáa nakað servicevirksemi á skipasmiðum o.s.fr., men tað hevur ikki meining hjá okkum, um vit ikki fáa rentað kapitaltól og um tað ikki gevur nøkur føroysk arbeiðspláss, tí er hatta har at tveita við torvmold, at halda á við at tosa um tað stóra tapið, sum Føroyar hevur verið úti fyri.

Eg skal ærliga viðganga, at eg sjálvur hevði stórar vónir til hesa vinnu og vit tosaðu um tað í 25 ár ja, síðan beint eftir kríggið tosaðu javnaðarmenn um hetta her at koma inn á henda marknað, sum var náttúrligur fyri føroyingar, serliga kanska eisini tað at fara undir sokallaða niechevirksemi við rakstri av specialskipum. Men tað skerst nú einaferð ikki burtur, og tað nyttar ikki at kasta við tí, at tapið varð avmarkað til 150 mió.kr. tað vildi havt verið nógv fleiri 100 mió.kr. og skipini høvdu ikki borið seg enn, tey bera seg ikki í dag. Eg havi hoyrt, at ein føroyingur, sum hevur spælt ein stóran leiklut í hesum her, júst fyri 14 døgum síðani hevur keypt 2 gasstangabátar við undir 20 mió.kr. stykkið.

Pauli Ellefsen (sb.)

Harra formaður.

Hilmar Kass hevði eitt innlegg og eg haldi ikki at tað var eitt eitt einasta orð ið hasum innleggjnum, sum Hilmar Kass ikki hevur sagt nógva ferðir fyrr her frá pallinum í hesi her árini, men kanska tað var nakað nýtt. Um man nú rættiliga lurtaði eftir innleggjnum, so hoyrdi man, at Hilmar Kass hevði havt eitt hundrað procent blint álit á øllum tí, sum eg gjørdi úti í Tinganesi, tað má eg siga, tað merkti eg ongantíð frá tíð degi vit fóru í samgongu. Eg havi ongantíð merkt hetta fantastíska álitið til mín fakliga kunnleika og alt annað og hann krógvaði tað ómetaliga væl,

meðan vit sótu har, men lat tað fara.

Tá ið nú Hilmar Kass einaferð enn kemur við hesum her felagnum P/F Grannskoðarastovan Pauli Ellefsen, so er tað ein veruleiki, sum sjálvandi allir vita, at eg skuldi niðurleggja tað arbeiðið, tá eg tók við sum løgmaður, og eg byrjaði ikki fyrr enn aftaná. Og alt tað, sum kom frá tí felagnum tað var ein danskur grannskoðari sum kallaðist, Robert Le Fevre Sørensen hann er deyður nú og liggur grivin á Fyn, hann gjørdi tað tilfarið sum kom til landsstýrið og eg skal standa fast við, at Robert Le Fevre Sørensen stóð ikki aftan fyri nakran grannskoðara í Føroyum í fakligum kunnleika, hvørki teir táverandi, tá var eg ikki grannskoðari, heldur ikki teir núverandi. Eg haldi tað, eg leggi ikki eitt petti í hvat Hilmar Kass sigur um meg persónliga, men eg haldi, at Hilmar sum formaður fyri einum flokki, sum sítandi er á tingi mátti latið vera við hasum har, men lat tað fara.

So tosar hann um prisir, og at hesi skipini vóru til byggipris, tað lógðu kontraktir frá skipasmiðjuni og tað er tað vanliga, sum eitt og hvørt landsstýri, ein og hvør lánistovnur tekur sum grundarlag og so sigur Hilmar Kass, sum tað ræðuliga, og tað skuldi ljóða, sum tað var nýtt, at sumt av tí var lán, ja, sjálvandi var tað lán, tað lá svart upp á hvítt. Tað lógu lánikontraktir í Tinganesi og tær vóru væl kendar, tær vóru góðkendar av juristum og tær liggja har enn. Tað hevur ongantíð verið nøkur loyna, at talan var um lán av einum ávísum parti av eginpeningi, men eftir stendur, at Global menn áttu meira enn 10% av keypspeninginum, og at teir hanga persónliga upp á meir enn 10% Hilmar Kass og Sverri Midjord spyrja okkum um ymiskt tað sum eg vísti á í áðni, tað er tað, at landsstýrið hevur sett kanningar, veldugar kanningar í gongd, man hevur havt kriminalpolititi til at jakstra hesar her privat mennirnar her í Føroyum, og tað kunnu vit ikki. Eg havi ikki sæð hesi úrslit, men eg havi fingið loyvi til at kaga niður í eitt papír, og har sá eg, at tað ikki var alt í finasta lagi við onkrum skipi, sum Hilmar Kass, sum Sjálvstýrisflokkurin kroysti í gjøgnum landsstýrið í móti minum vilja uttan at spyrja um nakað sum helst, har var eingin bardón. Eg sigi ikki, at orsøkin var, at ein sjálvstýrismaður skuldi setast í starv tá als ikki, men tað var um sama mundið. Tað skipið varð kroyst ígjøgnum, hóast eg ikki vildi, og tað er

tað einast úrslit, eg havi sæð og har var nokk ikki alt í lagi, eg rokni við dokumentatiónini sum so, men teir hava kanska ikki kunna livað upp til tað, sum teir hava lovað, og so endiliga Hilmar Kass hevur als ikki svara ðupp á mín spurning. Tað, sum eg sigi, er tað, hvat er nú hent síðan, tí áðrenn vit komu har út, var einki eftirlit, tá vit komu har út, royndu vit at stápla eitt eftirlit upp á beinini, figgjarnevndin hjálpti okkum við at stramma yvir fyri eigarunum og tað er møguligt, at tað ikki altið hevur eydnast. Men so er tað, at eg spyrji, hesin veldugi flotin uppá 600 mió.kr. sum nú liggur bundin. Tá ið Hilmar Kass vendur hoynum ella vendur sátubørnum inni á vestara arni á Skálafjørðinum og sær út yvir alla herligheitina, hevur hvønn tá ongantíð komið til hugs, hvussu eftirlitið var við eginpeningi og við figgjan av øllum hesum skipum. Eg havi ilt við at trúgva, at man hevur fylgt tí linju og bøtt um tað linjuna, sum vit høvdu. Eg kundi væl hugsað mær at sæð dokumentatiónina fyri hesi her skip, bæði tá tey komu og tá tey fóru á tvang fyrstu ferð. Tað var hatta, eg vildi ikki fyri at forfylgja privatmonnunum, men meira fyri at fáa ein sakligt orðaskift, tí tað er tað, sum hevur verið galið her í tinginum. Vit hava ongantíð havt naka sakligt Orðaskifti. Hilmar Kass hevur brúkt eina øðiliga tíð upp á at skuldseta meg fyri ymiskt, sum eg undir ongum umstøðum kann hava gjørt, ti eg hevði ikki loyvi til tað. Vit skuldu biðið figgjarnevndina um loyvi til tað, um eg skuldi gjørt tað. Tað er tað, sum hann hevur brúkt tíðina til í staðin fyri at fara niður í materiuna av spurninginum og so siga: Áðrenn vit komu, til dugdi yvirhøvur ikki. Tá vit komu til, royndu vit, eydnaðist tað eitt sindur betur eitt sindur verri, tað veit Hilmar nógv betur enn eg. Og so sigi eg, hvat er so hent í hesi samgonguni og tað triðja tað allar besta, men har kann Hilmar Kass lata vera, tí hann hevur sagt, at harn stillar ikki uppaftur, so kunnu vit aðrir diskutera. Vit í Sambandsflokkinum vilja fegnir diskutera við fríggjararnar hjá okkum sum, sum vilja í samgongu við okkum. Hvussu skulu vit leggja til rættis næsta valskeið fyri at fáa tað longur upp. Tað var hagar eg vildi og ikki hetta her smádreingja brikslið, sum Hilmar Kass kom við.

Karolina Petersen (kfff.) viðmerking

Tað er ein viðmering til Óla Breckmann. Tað er tó fantastiskt, sum Pauli Ellefsen og Óli Breckmann

kunnu standa her avslappaðir og tosa um, hvussu tað ikki gjørdist við at fólk mistu pening við Global skipunum. Tá hugsað verður um, at nógvar familjur vóru um at missa hús og heim av hesum skipum og hetta eru menn, sum vilja hava okkum at halda, at teir eru egnaðir til at hava ábyrgd av landsins stýri. Tað er, sum eg segði fyrr í kvøld, teir eru bara ekspertar í einum og tað er at leggja reik út yvir teirra egnu mistøk, men tit undirmeta fólk, um tit halda, at fólk í bræði gloyma Global málið.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Nú skal man royna at verða lagaligur við fólk, sum koma inn av gøtuni inn í løgtingið og ikki hava meira skil á politikki, enn hundur á himmiríkið, men eitt skal vera púra greitt Karolina Petersen, tað er tað landsstýrið, sum Framsóknarflokkurin, ella hvat hann eitur nú stuðlar, sum ein samgonguflokkur, sum beindi fyri farmaskipunum og sum beindi fyri arbeiðsplássunum í farmavinnuni og sum beindi fyri sparipengunum, tað má væl verða fullkomiliga eyðvitað á, sama hátt sum hetta landsstýrið nú er við at beina fyri øllum svartkjaftaskipunum.

Tá vit tosa um ognarviðurskiftini á rekonstrueraðum farmaskipum, so havi eg sagt, at tað skuldi ikki verið nakað vandamál at fingið privatfeløg endurstovnað ella nýggj privat feløg stovnað sum kundu tikið sær av hesum skipum og ført tey víðari á tí íløguniveau, sum tey vóru komin niður á, tá tey vórðu tvingseld.

Vit síggja greinar í altjóða sjófartsbløðum um, hvat ið fraktgjøldini bera nú, og vit vita, tey bløðini hava, ið hvussu so er minst líka góðar upplýsingar sum Atli Dam hevur um slík mál, at farmagjøldini í dag bera okkara farmaflota á tí støði, á tí lánistøði, sum hann nú liggur á.

Um so er, at ein føroyingur hevur keypt 2 farmaskip fyri 20 mió.kr. stykkið, so er tað í lagið. Annars ljóðar tað, sum um Atli Dam er eitt sindur meira lættsintur um hundrað tals milliónir til svartkjaftaskip, tað hevur jú verið eitt stórt cirkus nú í 4 ár, enn??? hann er, tá talan er um viljan? til at bjarga einum heilum farmaflota.

Atli Dam (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Sjálvt um tað hevur verið ógvuliga torført at fáa nakað at vita um ta loysn, sum Fólkaflokkurin

serliga og kanska Sambandsflokkurin við vísti á í hesum her farmaskipamáli, so fangar Óli Breckmann seg sjálvan nú í tí vavstri, hann vindur her uppi.

Tað var landsstýrið, sum beindi fyri flotanum, tað var landsstýrið, sum hevur beint fyri arbeiðsplássunum og tað er landsstýrið, sum hevur beint fyri sparipeninginum, í sama andadrátti, vit stovna nýggj feløg, nýggj fólk, sum skulu yvirtaka hesi skip til eitt minni virði. Men hvar vildi sparipeningurin tá verið farin Óli Breckmann hesin eginpeningurin. Tað er ikki hann, sum fyrst verður mistur, hevði hann ikki verið farin, áðrenn hesi nýggju feløgini yvirtóku hesi skipini. Er tað so landsstýrið, sum hevur beint fyri hesum sparipeninginum.

Karolina Petersen (fr.) viðmerking

Til Óla Breckmann og hansara háðandi orð um Framsóknarflokkin um hund í himmiríki o.s.fr.

Tað kemur sjálvsagt illa við, at onkur roynir at minna Fólkaflokkin á hansara mistøk. Karolina Petersen er ikki so nýggj í politikki, at hon ikki sær, hvussu ábyrgdarleysur hasin flokkurin er.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Eg fái als ikki svarað Karolinu Petersen. Um hon situr her og heldur, at tað er Fólkaflokkurin, sum hevur sitið í landsstýrinum í 4 ár, so hevur hon hugt illa uttan um seg, tað er væl ikki neyðugt at endurtaka, at tað er hetta landsstýrið og ikki andstøðan, sum hevur tikið ta prinsipavgerð tíðliga í skeiðnum, at farmaflotin skuldi ikki varðveitast í hesum landinum, at kapitaltólið skuldi seljast oman eftir ánni saman við tí peninginum, sum kanska ikki stóð til at bjarga, tá ið sølurnar fóru fram. Sparipeningurin fór, men eg ivist ikki í, at ein rúgva av teimum monnum, sum mistu sín sparipening, høvdu verið sinnaðir til at sett meira til, um teir orkaðu tað, og ið hvussu so er koma summir av teimum at seta nógvan pening til, tá ið uppgjørt verður, fyri at bjarga tí, sum bjargast kundi nevniliga tí allar týdningarmesta í hasum málinum, og tað var at varðveita skipini sjálvi undir føroyskum flaggi.

Karin Kjølbro (tf.) viðmerking

Harra formaður. Tað var væntandi, at hetta her fór at stinga seg uppaftur, men nøkur av okkum minnast eitt annað

skip, sum var við at rúka, sum landsmenn okkara áttu og sum var á føroyskum kjøli, tað var "Norrøna", sum kom í kreppu stutt undan valinum 1984. Hvør var tað tá, sum ikki vildi rætta eina hond, men tá andstøðan tók seg saman og fekk skaffað pening millum borgarar landsins, tá vildi Fólkflokkurin ikki verða við, men tá talan er um at seta drenið í landskassan, tá var Fólkaflokkurin við.

Tað var Petur Reinert sum gekk á odda fyri at fáa hatta har og andstøðan hjálpti, annars var Norrøna eisini rokin. Og hygg eftir Norrønu í dag, nú fer hon at gjalda okkum pengarnar aftur.

Hilmar Kass (sj.) (viðmerking)

Harra formaður.

Nú havi eg so ofta hoyrt Óla Breckmann og eg undrist yvir, at Føroya fólk ikki skal hava fingið eyguni upp fyri honum, tí eg fekk týðuliga og greitt at vita, at ein loysn kundi verðið viðvíkjandi farmaskipunum, tað var tað, at landið keypti skipini. Tí hevði landi fyrst keypt skipini, hvør so sigur, at tey skuldu seljast aftur? Hatta fingu vit so váttað her, men tað er eisini ein heil náttúrligheit, tá tað er landið, sum skal hava alla ábyrgdina fyri, at eitt privat virki gongur ella ikki gongur, so er tað eitt sosialistiskt tos, tað er kommunistiskt tos, tað hava vit fingið ásannað.

Pauli Ellefsen tosar um, at eg hevði blint álit á honum. Nei, eg hevði óivað alt ov nógv álit á honum ta fyrstu tíðina, men ta seinnu tíðina var langt, so at álitið var blankt tvørturímóti tað var sera lítið. Hann heldur fram við at tosa um, at hesir partaeigararnir áttu meira enn henda peningin, tað trúgvi eg væl, men tað, sum var og er frammi, er tað, at peningurin var, tað stóð ikki til svars fyri peninginum, teir høvdu ikki lánt nakran pening. Tað gjørdi ikki mun, um menninir eiga 5 mió.kr. ella 10 mió.kr., tá teir ikki seta teir í felagið og so leingi, sum tað er lán, ið teir høvdu tikið og ikki gekk beinleiðis til tað persónliga so leingi heftu teir ikki fyri tey, og tað er tað, sum er so harmiligt aftaná, at vit minnast ta herferð, ið Pauli Ellefsen hevði júst um handa sama spurning, tá tað snúði seg um eitt annað skip. So nevnir hann eitt skip, sum var kroyst í gjøgnum, eg haldi, at hetta má vera gassbátarnir, hann her sipar til. Eg dugdi ikki í teimum viðgerðum, vit høvdu í hesum føri, at síggja nakran annan mun á gassbátunum og

teimum undanfarnu bátunum uttan tað, at tað var ikki sami grannskoðari, eg sá ongan annan mun.

Tað var ein fyrimunur við hesum bátunum, og tað var, at hetta var í einasta føri, hvar tað var ein leiðari, sum hevði veruligt innlit í hesa vinnu. Men tíverri har hevur innlitið ikki verið nóg gott, hann hevði ið hvussu so er arbeitt leingi á hesum øki. Hann vísir á, at hesin grannskoðarin hevði gjørt eitt arbeiði; að var ikki tað, sum eg var inní á men eg nevndi júst henda her løgmann sum hevði faklíga útbúgving, sum burdi havt møguleikar at meta tað arbeiðiðm, sum var fyrilagt, og sum vit fingu fyrilagt. Tað stendur óreingiliga fast, at hesi skipini kostaðu millum 2 og 3 ferðir tað, tey kundu svara fyri og tað er ein sera skeiv meting. Tí er tað nokk so tungt, tá nú hesin sami maður veit nágreiniliga ja, soleiðis skuldu vit havt gjørt. Nú hevur hann ikki játtað tað sama, sum Óli, at tað var ein loysn, at landið keypti skipini og rak tey, men tað má væl verða tað næsta at hugsa.

Hetta er ein sorgarleikur, sum er farin fram og eg havi tíverri min leiklut. Eg var við at samtykkja tað, sum lógin varð gjørd eftir, sjálvt um vit í nógvum førum ikki vildí brúka lógina sum frá leið m.a., tá eitt skip varð keypt fyri 140 mió.kr. sum stutt aftan á ikki kundi seljast fyri 50 mió.kr., tá var eg ikki við. Í figgjarnevndini vóru enntá tveir mans, bæði Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum vóru í móti tveimum bátum, sum vórðu keyptir beinleiðis við tí endamáli at vinna á ti største føroyska arbeiðsplássi, men tað vil siga Copenhagen Reefers, gott nokk undir donskum fløggum, men har er ein rúgva av føroyingum við teimum skipunum.

Tá tað verður sagt, at um skipini vóru keypt fyri tað, tey tá stóðu í, um landið keypti tey óttist eg fyri, um tey høvdu svarað hvørjum sitt. Tá ið Óli Breckmann boðar frá hesum hækkandi prísinum fyri flutning, nú hugsi eg her um kemikaliir, so er tað ikki rætt tíverrí teir eru ikki hækkaðir samanborið við prísleguna, sum er í dag, so har hevði óivað verið sera tungt, hygg bara eftir, hvussu tungt tað er at dríva farmaskip sum heild, at teir serkønu danir og norðmenn hava verið noyddir til at ásanna, at manningarnar á hesum skipum kunnu ikki gjalda skatt, so mikið lægri kunnu tær verða løntar. Tað er ið hvussu so er mær eitt púra greitt svar uppá, at hetta høvdu vit ikki klárað við teimum prísum sjálvt, um vit fingu tað, tí annars var

tað betri at farið út og keypt skip, onnur skip, góð skip, tá tey kundu fingist nógv biligarí enn hasar 50 mió.kr., ið tey vóru komin at standa í.

Karolina Petersen (fr.) (viðmerking)

Tað var ein viðmerking afturat til Óla Breckmann.

Pening hjá smáspararum í Føroyum kallar Óli Breckmann í dag fyri kapitaltól, nei, hesi fólk hava ongan pening eftir at seta í onnur skip. Tey eru farin undir at byrja av nýggjum at gjalda síni egnu hús, sum tey mundu mist.

Óli Breckmann (ff) viðmerking

Ja, síðsti æraði talari, sum tey mundu mist undir hesum her landsstýrinum, sum Framsóknarflokkurin ella, hvat tann flokkurin nú eitur, hevur bjargað ella longt lívið á í nakrar mánaðir. Eg má eina ferð aftur at avsanna, at eg havi mælt til at landið skuldi keypa farmaskipini. Eg segði og havi sagt fleiri ferðir fyrr, at tað, sum samgongan gjørdi skeivt var, at avskriva hesi skip sum eina politiska prinsipavgerð, also við øðrum orðum at siga teimum feløgum, teimum privatpersónum, sum kanska vóru áhugaðir í at keypa, næstan tað sama sum, at tit sleppa ikki at keypa.

Til Karin Kjølbro skal eg siga, at tað var undir síðstu samgongu, at "Norrøna" varð keypt og at hon varð bjargað. Um Tjóðveldisflokkurin var við, eg minnist ikki aftur, um hann var við til at keypa, tá ið "Norrøna" varðv keypt og stuðla við veðhaldinum, men tað skal gleða meg, sum tað gjørdi tá eisini einaferð enn at hugsa um, at Tjóðveldisflokkurin var við til at bjarga "Norrønu" tá ið hon var komin í fíggjarligar trupulleikar av ávísum umstøðum.

Heini O. Heinesen (ff.)(viðmerking)

Harra formaður.

Tað er nokk so nógv fyri at sita og lurta eftir tí hátt virda løgtingsmanninum Óla Breckmann, tá hann tosar um, undir hesum landsstýrinum, júst sum um tað hevur nakran týdning, tá ið man tosar um borgarligan politikk, tá ið nakað fer á heysin, um tað hevur nakran týdning, hvør situr í landsstýrinum, um tað skuldi gjørt nakran mun. Eitt er heilt givið, at um hesin landskassin hevði keypt hesi skipini fyri 50 mió.kr. sluppu teir aldri av aftur við hesi skipini.

Løgmaður nevnir, at ein føroyingur hevur keypt tvey skip fyri undir 20 mió.kr. Landskassin hevði hingið upp á hasi skipini í dag, tað er tað, sum

er tað sum hevði verðið veruleiki. Eg dugi ikki at siggja, hvussu teir, sum áttu skipini skuldu kunnað keypt skipini aftur.

Eg vildi hildið, at Óli Breckmann skuldi komið upp higar og greitt frá hesum tað fyri Føroya fólki, hvussu hesir menn skuldu kunnað keypt hasi skipini aftur. Hvaðani skuldu teir fingið pengarnar? Skuldu teir stolið teir ella, hvussu skuldu teir gjørt? Eg vildi fegin havt eina frágreiðing um hetta. Skuldu teir keypt skipini og landskassin betalti tey ella hvat er hatta har, er hatta har borgarligur politikkur hatta er rein privat kommunisma?

Óli Breckmann (ff.) (viðmerking)

Ja, eg tími ikki at vísa, harra formaður, til tað, sum Karin Kjølbro segði um "Det republikanske parti Tjóðveldisflokkurin, som mange færøske kommunister stemmer på." Lat tað fara, eg veit at tjóðveldismenn vita nógv um kommunismu og kommunistar, men tað var serliga hin spurningurin, eg fari at venda honum við at spyrja ærøða talaran, um hann kann koma upp higar og siga fyri Føroya fólki og fyri løgtinginum, hvussu ein flokkur sum Tjóðveldisflokkurin fær seg til at taka eina prinsipavgerð um, at ein føroyskur farmafloti skal avhøvdast fyri ein og hvønn prís. Tað var tað, sum vit fingu at vita, úti í Tinganesi, var orsøkin til at farmaflotin feyk.

Heini O. Heinesen (tf.) (viðmerking)

Harra formaður.

Tað er eingin samgonga, sum situr í dag, ið hevur tikið nakra principavgerð um at avhøvda nakran farmaskipaflota. Eg vil halda, at teir sum mæltu til at gera hesar íløgurnar, hava sjálvir avhøvdað hesar merninar plus flotan. Har aftrat ætlaðu teir at avhøvda landskassan oman á tað heila, tað er tað, sum Óli Breckmann hevur mælt til. Tað er heilt givið, at um landskassin keypti hesi skipini fyri 50 mió.kr., so hingu teir upp á øll skipini í dag, hvat skuldu teir gjørt við tey?Óli Breckmann kundi kanska fari umborð fyri hálva løn. Tað er tað, sum er hent í hesum málinum.

So eitt afturat eisini, at bæði Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin høvdu biðið um loyvi at leggja uppskot fyri tingið, tá tíðin var úti. Hví komu teir ikki i tingi við eini loysn? Tað vóru helst fleiri samgongumenn, sum høvdu kunnað atkvøtt fyri eini loysn, um teir komu við eini ítøkiligari loysn Men teir tordu ikki at leggja

nakað fram. Teir meintu sjálvir, at tað var ikki nakar møguleiki, teir kundi eisini leggja málið í tingið, landsstýrið hevði ongar heimildir at brúka meir pening har, tað skuldi fyri tingið. Allir tingmenn

hava loyvi at leggja uppskot fyri tingið eisini Óli Breckmann um at bjarga hesum skipum, so fekk tað eina parlamentariska loysn, tað var tað einasta lógliga í hesum málinum, tað hevði Fólkaflokkurin møguleika til. Takk fyri.

Pauli Ellefsen (sb.) (viðmerking)

Harra formaður.

Tað var Hilmar Kass. Har var aftur bara endurtøkur enn tá henda grova insinuatiónin eina ferð aftur at um, at tað skuldi verða avgerandi, hvør var grannskoðari og um innflutningsloyvi varð givið ella ikki, og tað er sjálvandi heilt burtur við. Eg kann bara t.d nevna Norrønu, eg takið mær æruna av, at millumlandasiglingin varð privatisera og Norrøna kom til landið. Tað var ongantíð diskusión um, hvør skuldi verða grannskoðari. Vit kunnu taka Reynsatind t.d., vit vóru kroystir av Sjálvstýrisflokkinum til at geva innflutningsloyvi til Reynsatind. Tað vóru sjálvstýrismenn úr Fuglafirði, sum skuldu hava hann. Tað vóru ærligir menn, teir komu aftan og søgdu, at teir orkaðu ikki at lyfta hann, tá var eingin áhugi frá Sjálvstýrisflokkinum um at fáa bátin yvurhøvur. Har var ongantíð talan um, hvør skuldi verða grannskoðari og soleiðis kundi eg nevnt allan vegin í gjøgnum tað varð enn tá gjørd hagtøl í landsstýrinum. Orsakað av Hilmari Kass gjørdi ein fulltrúi hagtøl yvir, hvørjir grannskoðarar høvdu hesi virkini og tað sá ógvulig vanligt út, also lítið til mín, men o.k., tað eri eg so vanur við, og sigur Hilmar Kass, at hann hevði ikki blint álit á mær í byrjanini, men nokk so nógv og tað minkaði. Hjá mær var tað beint unvent eg hevði lítið álit á Hilmari Kass heilt frá byrjanini. Hilmar Kass hevur altíð verið ein gáta fyri mær, tað hevur altið verið ein gáta fyri mær, at ein so ómetaliga lítil og minkandi politikari kann búleikast í so nógv ár í einum so trivaligum mannakroppi. Eg haldi tað er fantastiskt.

Og so aftur til tað, sum eg spurdi um, hvar er svarið? Hví henda langa diskussiónin? Tað, sum eg spurdi Hilmar Kass um aftan á hansara insinuatiónir í gjøgnum 5, 6, 7 ferðir her undir hesum ordaskiftinum um egin pening. Eg sigi, hvat er hent nú hesi seinastu 4 árini.

Hilmar Kass sigur, at hann hevur ávara meg fyri 8 árum síðani ella sjey árum síðani, Hvat fyri ávaringar eru sendar út hesi 4 árini. Hvussu ætlar Hilmar Kass, at vit aðrir skulu legja til rættis næstu 4 árini? Hvussu er støðið? Tað var tað, sum eg vildi hava diskussión um, og tað er noktað, tað er einki svar.

Hilmar Kass (sj.) (viðmerking)

Pauli Ellefsen fylgir lítið við í politikki. Eg skal ikki tosa um stórar og smáar politikarar, tað skal verða har við, men eg valdi ein løgmann, hann var løgmaður av navni í eini samgongu í 4 ár, tað er tað største vónbrot í mínum politiska lívi.

Jú, eg leggi frá mær við góðari sannvitsku, tí vit hava fingið júst henda spurningin upp á pláss viðvikjandi eginpeninginum. Nú skal ikki latast meir enn 5% í stuðulsláni og tað almenna skal ikki verða uppií, og ein banki skal verða ájavnt við tey 5%, tí eg havi heldur ikki verði nøgdur við eginpeningin í hesi samgonguni.

Pauli Ellefsen undrast yvir tað, sum eg havi gjørt á løgtingi. Eg havi tó verið formaður fyri ein av teimum smáu flokkunum, men at ein maður við so ivasamum eginleikum, sum Pauli Ellefsen, skal kunna hava sitið sum formaður til tíðir í største flokkinum, tað sigur mær bert, at tað eru ikki øll, sum fylgja væl við, hvat hendir á Føroya løgtingi. Tað eru ikki nakrar sum helst insinuatiónir viðvíkjandi eginpeningi, tú kann seta teg niður og taka øll tey fyrstu skipini, sum vórðu viðgjørd, so var tað Grannskoðaravirkið Pauli Ellefsen, sum var grannskoðari fyri tey skipini, sum vóru bygd uttanlands. Tað var ikki fyrr eftir eini grein í Dimmlætting, hvar eg vísti á hvussu sera nógv skip, ið vóru komin, tað var bert tað eina dømi, sum Pauli Ellefsen segði korta nei, sum kom í gjøgnum, sjálvt um man ikki tá samtykti hann skipini hjá Drekanum hann tordi ikki, at tað skuldi bara kunna vísast øll skipini, sum vóru bygd uttanlands eftir hesi lógini, sum hann sjálvur hevði fingið í gjøgnum ella Grannskoðaravirkið Pauli Ellefsen, og tí ivist eg stórliga í, um ein maður, sum hevur gjørt hesar kalkulatiónir, sum hevur sínar fortreytir, sum Pauli Ellefsen hevur havt, og sum hevur fingið so stóra inntøku burtur úr teimum tiltøkum, sum har hava verið gjørd gjøgnum hesi partafeløg, um hann yvirhøvur hevur gingið leysur, um tað var

eitt vanligt samfelag. Vit skulu minnast til borgarstjóran í Alborg, hann hevði 60.000, sum hann hevði fingið, tað var alt, tel túsundini upp, sum Pauli Ellefsen hevur fingið av politiskum samtyktum, eg tori ikki at vita, um tað kann sammetast við hatta, men tað vóru samtyktir, sum vóru gjørdar Pauli Ellefen. Tí havi eg mangan undrast, at Pauli Ellefsen ikki tigur, tá tað kemur til farmaskipini, tí tey í mínari verð og mínari meting liggja so nógv næst við tað, sum teir politikarar hava útnyttað landsins borgarar fyri hundraðar av milliónum fyri egnan pening og egnan vinning.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var til tað síðsta, sum Heini O. Heinesen segði. Eg haldi tað verða fantastiska vesæligt at koma upp higar nú aftan á at hava sitið í 4 ár í samgongu aftan á at hava oyðilagt farmavinnuna, aftan á at hava oyðilagt svartkjaftavinnuna, at koma upp her at spyrja Fólkaflokkin, hví vit ikki høvdu eitt uppskot til at bjarga farmaskipaflotanum, tá ið henda samgongan varð stovnað við tí fyri eygað at halda Fólkaflokkin uttan fyri ávirkan vesæligt.

Heini O. Heinesen (tf) viðmerk.

Harra formaður.

Hetta skal vera mín seinasta viðmerking til Óla Breckmann. Teir høvdu einki uppskot, tí teir trúðu ikki upp á tað, sum teir sjálvir høvdu verið pápar at, tað er svarið.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Harra formaður.

Eg haldi, at hatta har, sum Hilmar Kass segði nú í seinastuni, hatta var so langt úti, at eg vil ikki kommentera tað, men eg kundi væl hugsa mær, at harn nú, tá tað verður útvarpað tekur og skrivar tað orð fyri orð niður og so setur hasar har pástandirnar fram alment, so kunnu vit tosa víðari um tað.

Til tað konkreta í svarinum hjá Hilmari Kass. Hann sigur, at nú er eginpeningurin komin upp á pláss, so vil eg siga, svartkjaftaflotin, tað var hann sum spurdi varð um, er tað veruliga soleiðis, at tað eru 5% krøv, og bankin stendur inni fyri øllum við helvtini o.s.fr. er tað veruliga soleiðis, tí alt hetta kjakið er komið av einum sakligum spurningi frá mínari síðu, hvat er hent á eginpeningsøkinum hesi seinastu 4 árini? Tað er alt, sum eg bað um at vita, men eg má siga tað at eg havi fingið nokk so nógv annað fram í útvarpið, men eg kundi væl hugsað mær, at Hilmar

Kass tekur og skrivar hetta her orðarætt niður og setur tað í Tingakross sum ein pástand, so kunnu vit tosa saman.

Hilmar Kass (sj.)

Harra formaður.

Hví halda fram við at tosa um eginpeningin, tað er fullkomiliga krystal klárt og prógvað, at eginpeningurin var ikki til staðar í farmaskipunum Pauli Ellefsen. Vit minnast til, at tað var Pauli Ellefsen, sum fór fram á henda hátt við eginpeninginum, tað er fullkomiliga krystal klárt. Eg tori ikki at standa ímni fyri, um tað var nokk av eginpeningi til svartkjaftaskipini, men aftan á tað eru lógirnar broyttar soleiðis, og tað var nakað, sum Pauli Ellefsen hevði nógv frammi einaferð, at eg vildi sagt at tað var betri ongan eginpening at hava enn, um hatta skuldi verða lagið og bara dýrka skipini. Tað er tað sum stendur fullkomiliga krystal klárt í hesum her málinum.

Pauli Ellefsen (sb.) viðmerking

Nei eg kann bara endurtaka, at eg haldi, at Hilmar Kass skuldi tikið og skriva niður orð fyri orð hatta har, sum hann segði her í útvarpinum og so koyra tað í Tingakross sum ein pástand.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Nú er tað soleiðis, at hesi seinastu 4 árini havi eg umsitið tað málsøkið í landsstýrinum, sum eitur sjóvinnumál og tað kann tykast eitt sindur løgið, at eg ikki havi luttikið í tí orðaskifti, sum er farið fram her hesar her seinastu tímarnar. Eg vil bara nýta høvið til at siga frá, at orsøkirnar eru tvirnar, onnur er tann, at eg haldi, at málið er úti upp á at tera, tað er skrivað aftur og fram í bløðunum í fleiri mánaðar um hetta her málið, tað er umrætt í politiskum valsendingum, á politiskum fundum, og eg haldi at tað verður ikki til annað enn trætarí, tað er onnur orsøkin til, at eg ikki havi tikið orið hesar her seinastu tímarnar. Hin orsøkin er, at hetta hevur verið sum at sæð ein ljótan fótbóltsdyst, har menn lata bóltin rulla og royna at sparka hin á skinnabeinið, og sjálvandi høvuðsleikarin í tí ýstinum, hann eitur Óli Breckmann.

Atli P. Dam (jv.) viðmerking

Eg rokni við, at eg fari at enda hetta orðaskiftið, harra formaður, so eg skal ikki taka nakað nýtt upp í kjakið viðvíkjandi eginpeninginum bert vísa til tað, sum er skrivað á

síðu 4 í løgmansrøðuni, har greitt er frá, at eginpeningskrøvini er skerd.

Harafturat skal eg afturvísa pástandin um, at henda samgonga hevur valt menn út, aðrar menn til at umsita samfelagsognirnar, allir hava verði líka fyri lógini undir hesari samgonguni, tað tori eg at og menn hava havt sín kjans soleiðis, sum umstøðurnar nú hava verið í teimum umsóknum, sum sendar eru landsstýrinum.

Lat meg at enda takka fyri orðaskiftið eina ferð enn, og siga at tað er ein misskiljing um menn hava fatað hesa røðuna sum eina ljósareyðan málning ella eina ljósareyða mynd av støðuni í okkara samfelag. Tað hevur ikki verið meiningin at mála nakað ljósareytt, men at geva eina realistiska mynd av støðuni í okkara samfelag í dag, og at ávísa, at loysnir finnast, loysnir sum gera tað, at vit framvegis kunnu tryggja okkum hetta góða samfelagið, sum vit eiga, takk fyri.

Formaðurin

So eru ikki fleiri, sum hava bíðið um orðið, og so er henda viðgerðin av løgmansrøðuni úti.
Vilhelm Johannesen hevur orði til framløgu av tingmáli nr. 6 veiting av ríkisborgararætti.

Vilhelm Johannesen (jv.)

Harra formaður.

Vegna landsstýrið skal eg leggja fram løgtingsmál nr. 6, 1988: Veiting av ríkisborgararætti.

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevnda lóg verður lýst at galda í Føroyum. Eftir lógini verður eisini veittur 5 persónum búsitandi í Føroyum ríkisborgararættur. Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við tilmæli.

Og við formansins loyvi skal eg lesa uppskot til samtyktar: Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 157 frá 23. mars 1988 um veiting av ríkisborgararætti verður lýst at galda í Føroyum. Við hesum er máli lagt fram.

Formaðurin

løgmaður fær orðið til framløgu av tingmáli nr. 11 eykajáttan til grunnar og nevndir víkjandi fiskivinnuni.

Atli Dam (jv.)

Harra formaður.

Tað er kent, hetta máli, tað var til viðgerðar í juni mánað og tað lá tá í kortunum, at landsstýrið fór at søkja um eina upphædd, sum lá ímillum 80 og 100 mió.kr. til grunnar, ráfiskagrunnar, eykagrunn o.s.fr. í fiskivinnuni og hett uppskot gongur út upp á, at søkja um 100 mió.kr. og

harafturat at lána upp til 30 mió.kr. til tann sonevnda upphøggingargrunnin, so eg haldi ikki, tað er neyðugt at lesa málið upp, men bert konstatera tað, at tað við hesum er framlagt.

Forðmaðurin

Karolina Petersen fær orðið til framløgu av tingmáli nr. 3, Broytingar í almannalóggávuni.

Vegna landsstýrið skal eg leggja uppskot fram um broytingar í almannalóggávuni.

Uppskotini fevna um tvey sløg av broytingum, fyrsta uppskoti er um tekniskar broytingar av tí orsøk at danir hav null stilla prístal teirra sum føroysku pensiónirnar verða javnaðar eftir. Broytingarnar hava onga ávirkan á tað pensión sum einstaki pensionisturin fær broytingarnar hava ongar eyka útreiðslur við sær.

Annað uppskoti snýr seg um kærureglur, í løgtingsmáli nr. 122, 1987 hevur løgtingi álagt landsstýrinum at skipa fyrí, at kærunevnd verður sett í Føroyum viðvíkjandi ávísum avmarkaðum sløgum av almannaveitingum. Í galdandi lóggávu er í hvørjum førum sær ásett at landsstýri er kærustovnur, hetta kann so ikki verða broytt við avgerð einans av heimastýrinum, skotið verður tí upp, at seta inn reglu um heimild hjá heimastýrinum at leggja til rættis kæruviðurskiftini sum best verður hildið uttan, at ríkisstjórnin í framtíðini skal taka støðu til skapið av kæruskipanini. Umhugsað verður at samanseta kærunevndina soleiðis, dómarin ella annar løgfrøðingur, tilnevndur av landsstýrinum, landslæknin ella annar lækni tilnevndur av landsstýrinum, 3 umboð vald av Føroya Løgtingi, 1 umboð fyri meginfelag teirra brekaðu. So skal eg lesa uppskotið.

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri Fólkatingið hjáløgdu 2 uppskot til broytingar í almannalóggávuni.

Formaðurin

Karolina Petersen fær orðið til framløgu av tingmáli nr. 1, í løgtingslóg um vardar íbúðir.

Karolina Petersen (fr.)

Vegna landsstýrið skal eg leggja hetta uppskoti fram um vardar íbúðir.

Avlamisfólk hava ikki ráð at byggja sær hús, tá tey einans hava eina avlamispensión at liva av, tey eru bundin til at leiga frá øðrum. Við teimum prísum, sum eru galdandi í dag, verður teirra møguleiki fyri at leiga eina góða íbúð lítil, tí leiguupphæddin kann verða upp í móti tí upphædd, sum tey fáa í avlamispensión um mánaðin. Tað sama kann sigast um eldri fólk sum skulu liva av fólkapensión.

Onnur norðanlond hava í mong ár bygt vardar íbúðin til hesar bólkar. Vardar íbúðir eru sum oftast bygdar soleiðis, at fleiri eindir eru samanbygdar, tær verða partvíst nýttar til fólk sum klára seg sjálvi og partvíst til fólk, sum mugu hava eina ávísa hjálp t.d fáa heimahjálp uttan í frá. Ongar reglur hava verið um vardar íbúðir. Men landsstýrið heldur, at tørvur er á hesum í Føroyum í dag sum bústaðarmøguleiki hjá avlamisfólki og gomlum.

Uppskotið er evnað til eftir galdandi lóg um bústaðarhús fyri fólk í útbúgving, løgtingslóg nr. 63, frá 23. juni 1983, broytt við løgtingslóg nr. 55, frá 9. juni, 1988, kostnaðurin verður ætlaður at verða 500.000 kr. umframt grundøkið. Landsstýrið hugsar sær vardu íbúðirnar fíggjaðar við vanligum lánum úr sparikassa og húsalánsgrunni og harafturat við einum rentu- og avdráttarfríum láni úr landskassanum upp á 40% av kostnaðinum, harafturat kemur grundøki sum væntandi fæst ókeypis frá tí kommunu, har vardu íbúðirnar verða bygdar. Landskassastudningurin til raksturin verður helvtin av útreiðslunum til rentur og avdrátt. Eftir hjálagda uppskoti til fígging og rakstur av vardu íbúðunum verður leigan fyri hvørt búðfólk 1540 kr. um mánaðin, hjálagt fylgir meting yvir kostnaðin, fígging og rakstur av einum bústaðarhúsi fyri 6 fólk.

Uppskotið um lógina ljóðar soleiðis:

Løgtingslóg um vardar íbúðir.

§ 1. Eftir reglunum í hesi lóg verður studningur latin til vardar íbúðir, sum hava til endamáls at hýsa avlamisfólki og eldri fólki og fólki annars, sum tørva at búgva í vardum umhvørvi og tryggja teimum eitt gott og hóskandi tilhald.

§ 2. Studningur verður latin til:

1. Bygging av nýggjum vardum íbúðum.
2. Keyp og umbygging av verandi bygningum til vardar íbúðir.
3. Rekstrarstudning til rentur og avdráttir.

§ 3. Studningur kann veitast upp til 40% av byggikostnaðinum ella av keypsprísi og umbyggingarkostnaði.

§ 4. Studningurin verður veittur sum rentu og avdráttarfrítt lán við pantirætti í ognini innan fyri 90% av virðinum.

§ 5. Í rekstrarstudningi kann veitast upp til 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum.

§ 6. Studningurin verður latin til stovnar, sum einans hava til endamáls at byggja, stovnseta og reka vardar íbúðir.

Stovnurin skal verða sjálv-
eigandi stovnur og hava viðtøk-
ur sum eru góðkendar av lands-
stýrinum.
stk. 2 Verða vardu íbúðirnar
ikki longur nýttar til
endamálið ella seldar, fellur
ognin netto/-søluprísurin til
landskassan, og ger landsstýrið
av, hvussu ognin/-peningurin
skal nýtast.

Henda lóg kemur í gildi
dagin eftir, at hon er kunn-
gjørd, hon verður við hesum
løgd fram.

Fundur lokin.

Blaðsíðurnar 342 –385 eru ikki til.

Fríggjadagin 2. september 1988, kl. 10°°.

Tingfundurin er settur og skrivarin lesur gerðabókina.

Harra formaður

Tað er fimti fundur.

31. aug. 1988 varð tingfundur settur. Allir tingmenn uttan Poul Michelsen, Ivan Johannesen, Adolf Hansen og Øssur av Steinum vóru á fundi.

Allir landsstýrismenn vóru á fundi. Løgmaður var á fundi og ríkisumboðsmaðurin var á fundi.

Gerðabókin frá seinasta fundi varð lisin og góðkend.

Til viðgerðar:

Innkomin skriv:

Skriv dagfest 24. august 1988 frá Rigsombudsmanden på Færøerne, at Bent Klinte er settur sum ríkisumboðsmaður í Føroyum.

Við 23-0 atkvøðum varð samtykt, at Ingrid Sondum skuldi taka sæti á tingi fyri Hans J. Debes, sum í skrivi frá 30. august 1988 bað um farloyvi vegna almenn ørindir tíðini frá 31. august til 16. september.

1. viðgerð av tingmáli nr. 1: Løgtingsmál um vardar íbúðir. Málið varð beint í almenna- og heilsunevndina.

1. viðgerð av tingmáli nr. 3: Lóg um broyting í almannalóggávuni. Málið varð beint í almenna og heilsunevndina.

1. viðgerð av tingmáli nr. 6: Vetingar av ríkisborgararætti. Málið varð beint í rættarnevndina.

1. viðgerð av tingmáli nr. 8: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. Málið varð beint í skattanevndina.

1. viðgerð av tingmáli nr. 11: Eykajáttan til grunnar og nevndir viðvíkjandi fiskivinnuni. Málið varð beint í fíggjarnevndina.

Framløga.

Jógvan Durhuus, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 13: Løgtingslóg um útbúgvingarstuðul.

Karolina Petersen, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 2: Løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensionistar.

Asbjørn Joensen, løgtingsmaður legði vegna Sjálvstýrisflokkin fram tingmál nr. 14: Broytingar í Fólkatingsvallógini.

Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 15: Avmarking av nýtslu av

freon.

Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 7: Lóg om bekendtgørelse og anordning på Færøerne.

Formaðurin boðaði frá fyrispurningi frá tingmanninum Poul J. Olsen, Heina O. Heinesen og Ásbjørn Joensen viðv. siglingarmøguleikum í Haraldssundi og Hvannasundi.

Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 10: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Atli Dam, løgmaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 18: Bygging av hølum til fiskirannsóknarstovuna.

Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 15: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um ferðagjald.

Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 17: Broytingar í løgtingslóg um Menningargrunn ídnaðarins.

Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 19: Keyp av ognum til landsumsitingina.

Fundur varð niðurlagdur kl. 16⁴⁵ og uppaftur tikin kl. 17⁰⁰.

Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 20: Millumlandasáttmáli viðv. dálking av havinum.

Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 12: Fíggjarløgtingslóg 1989.

Atli Dam, løgmaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 21: Einvís føroysk avmarking av torskaveiðuni í Barentshavinum.

Jóngerð Pukrhús, landsstýrismaður legði vegna landsstýrið fram tingmál nr. 22: Býti avrakstraravlopi landskassans fyri fíggjarárið 1987.

Formaðurin lýsti næsta fund at verða fríggjadagin 2. september kl. 10⁰⁰ við hesi dagsskrá:

1. viðgerð av tingmáli nr. 12: Fíggjarløgtingslóg 1989.
2. viðgerð av tingmáli nr. 16: avmarking av nýtsluni av freon.
1. viðgerð av tingmáli nr. 14: Broyting í fólkatingsvallógini.
1. viðgerð av tingmáli nr. 13: Løgtingslóg um útbúgvingar

1. viðgerð av tingmáli nr. 17: Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn ídnaðarins.
1. viðgerð av tingmáli nr. 15: Broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 11. mai 1988 um ferðagjald.
1. viðgerð av tingmáli nr. 18: bygging av hølum til fiskirannsóknarstovuna.
1. viðgerð av tingmáli nr. 10: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.
1. viðgerð av tingmáli nr. 20: Millumlandasáttmáli viðvíkjandi dálking av havinum.
1. viðgerð av tingmáli nr. 22: Býti av rakstraravlopi landskassans fyri fíggjarári 1987.
1. viðgerð av tingmáli nr. 21: Einvís .... av toskaveiðuni í Barentshavinum.

Framløga

Jógvan Sundstein bað um at tingmál nr. 5 verður útsett til tingið endar fríggjadagin.

Fundur lokin

Her eru nakrar viðmerkingar til tað lisnu gerðabókina.

Navnið á fyribils setta ríkisumboðsmanninum verður rættað.

Gerðabókin góðkend.

1. viðgerð av tingmáli nr. 16: Avmarking av nýtsluni av freon:

Eingin biður um orðið, so er orðaskiftið endað.

Tað er mælt til at málið fær viðgerð í umhvørvisnevndini, so verður tað gjørt.

1. viðgerð av tingmáli nr. 7: Lóg om bekendtgørelse af love og bekendtgørelse og anordning på Færøerne.

Eingin biður um orðið, so er orðaskiftið endað.

Málið verður beint til viðgerðar í rættarnevndini.

1. viðgerð av tingmáli nr. 20: Millumlandasáttmáli viðvíkjandi dálking av havinum.

Eingin biður um orðið, so er orðaskiftið endað.

Málið fer til viðgerðar í umhvørvisnevndini.

1. viðgerð av tingmáli nr. 15: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg frá 11. mai 1988 um ferðagjald.

Eingin biður um orðið, so er orðaskiftið endað.

Málið fer til viðgerðar í fíggjarnevndini.

1. viðgerð av tingmáli nr. 10: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Eingin biður um orðið, so er orðaskiftið endað.

Málið verður beint til viðgerðar í skattanevndini.

1. viðgerð av tingmáli nr. 12: Fíggjarløgtingslógin fyri 1989, har er eftir sum skilst frá flokkunum, semja um, ikki at hava nakað orðaskifti nú, men at málið verður beint í fíggjarnevndina tí, at eitt nýtt løgting skal samtykkja fíggjarlógina, og at orðaskifti sostatt verður seinni, so um eingin malir ímóti, so verður fíggjarløgtingslógin beind í fíggjarnevndina.

So er tað samtykt.

1. viðgerð av tingmáli nr. 17: Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn idnaðarins.

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður.

Leingi er tað, ið væl skal verða, plagar man at siga, og soleiðis er tað í hesum málinum, her er ið hvussu so er hent tað, at landsstýrið hevur ynkst nakrar broytingar í lógini um Menningargrunnin, fyri at opna møguleikar fyri at stuðla útjaðaraøkjunum í Føroyum meira enn. Tað hevur verið gjørt frammanundan, tað vil eg taka undir við, men samstundis havi eg nakrar spurningar til landsstýrimannin, og eg má siga, at eg eri ikki endaliga nøgdur við hetta uppskot, men hetta er ein góð byrjan og hetta er á rættu leið.

Sjálv broytingin í lógaruppskotinum er ikki rættiliga stór, hon sigur bert við formansins loyvi: "Landsstýrið ásetir teirri í § 7 nevndu reglugerð, hvussu stórt

lán, studningur og/ella veðhald kunnu verða veitt einstøkum virkjum uttan góðkenning frá landsstýrinum".. Tað er tað einasta sum stendur í lógini sjálvari.

Ein rættiliga stórur partur av við merkingunum verður brúktur upp á oyggjamenning og tað er tí, at vit í Fólkaflokkinum tvær ferðir hava reist spurninginum um at stuðla útoyggjunum meira enn, man hevur gjørt frammanundan. Vit hava havt eitt beinleiðis lógaruppskot um at stovna ein oyggjamenningargrunn, sum skal gev lagalig lán til útoyggjarnar í Føroyum.

Hetta hevur landsstýrið fyri so vítt havt heimild til tí, at landsstýrið er tað, sum ásetir reglugerðina fyri Menningargrunnin.

Nú hevur landsstýrismaðurin verið so umhygginș, at hann hevur lagt við eitt uppskot til eina nýggja reglugerð, og her eru nakrar nýggjar reglur komnar inn í, tað er her í § 13, stk. 12, við formansins sjálvandi: "Umframt tann í 2. stk. nevnda studning, kann studningur veitast upp til 15% av íløgukostnaðinum til stovnan av virkjum í útjaðaraøkinum ella um ein flytur virki frá meginøkinum til útjaðaraøki, hesin studningur verður eftir 5 árum lagdur um til vanlig veðrættarlán, um viðkomandi virki eftir nevndu 5 ár og eftir metan nevnd Menningargrunsins hevur rentabilitet í rakstrinum" og so stendur nakað um skifti av eigara. Her er tann beinleiðis studningurin, sum Menningargrunnurin skal fáa heimild til at lata fyri at stovnseta virkir í útjaðaraøkinum.

Okkara uppskot gekk út uppá, at vit skuldu geva lagalig lán, upp til 90%, við 43 ára avdráttartíð, trý tey fyrstu árini avdráttarfrí og so avdrátt í 40 ár við eini rentu uppá 3%.

Hetta uppskotið, sum fyriliggur her, gongur ikki nær til so langt. Síðan er tað eitt annað, sum eg eri eitt sindur skeptiskur við, tað er, at tað er upp til Menningrunnin at meta um, hvat er útjaðari í Føroyum. Nú veit eg ikki, um landsstýrið hevur gjørt sær nakrar tankar ella nakran lista yvir, hvat er útjaðari í Føroyum ella ikki.

Í okkara uppskoti til oyggjamenningargrunn, kundi bert latast lán til útoyggjar, sum ikki høvdu fast vegasamband við høvuðsvegakervini í Føroyum, og har var ein rættiliga greið definitión, hvørjar bygdir og hvørjar oyggjar,

sum komu undir hesa skipan.

Nú skal man meta um í hvørjum einstøkum førum, um ein bygd við einum føstum vegasambandi er eitt útjaðaraøki ella ikki, og har kemur so munurin inn, tað vil siga tann, sum skal leggja eitt virki, sum fær heiti útjaðraøkí og útjaðrvikri, men álíkavæl hevur fast ferðasamband til høvuðsøkið og høvuðs-vegakervini. Tað vil vera rættiliga nógv bíligari at leggja eitt virki har bæði í rakstri og anleggi,enn tað er á einari útoyggj. Tað vil siga, síðustillar man so tær smáu bygdirnar, sum liggja inni á meginøkinum, við útoyggjarnar, so eri eg bangin fyri, at vit ikki fáa nakra sum helst menning á útoyggjunum, og tað eri eg sannførdur um, at tað er har, ið tann allar, allar størsti tørvurin er í dag, tað eru tær oyggjarnar sum eru allar, allar ringast fyri.

Tí haldi eg, at hetta upp-skot kann verða gott í sjálvum. Eg vil taka undir við tí , og vil mæla til, at samtykkja tað, men harvið haldi eg ikki, at tørvurin á oyggjamenningar-grunninum er avloystur. Tí haldi eg, at landsstýrið við hesum her eigur at umhugsa at taka oyggjamenningargrunnin fram aftur og seta hann í verk, tí tað er ógvuliga lítil peningaupphædd tað snýr seg um. Tað er ógvuliga avmarkað virksemi, sum er á hesum plássum, tá vit samanbera tað við ta samlaðu figgjarorkuna og figgjartørvin á figgjarlóginí, men fyri tey plássini hevur tað avgjørdan týdning og tað, er kanska tað sum er fortreytin fyri, at ikki fleiri av hesum her plássunum verða avtoftað.

Eg rokni við at hetta málið fer í íðnaðarnevndina, har hevur tað verið fleiri ferðir fyrr, og eg ivist ikki í, at okkara umboð har fer at geva tí eina góða viðgerð.
Takk fyri.

Eilif Samuelsen (sb.)

Harra formaður.

Vit hava regluliga og við stuttum millumbilum her í tinginum havt til viðgerðar mál, ið hava samband við menningar-grunnin. Oftast hevur tað kanska verið í veðhald fyri lánum til grunnin, og í hesum sambandi hevur ofta spurningurin um útjaðaraøkini verið á tal.

Í løgtingsmálinum nr. 16/1987 var tað eísini við, og har hevði íðnaðarnevndin eitt uppskot til samtyktar, sum álegði landsstýrinum at broyta

reglugerðina fyri menningargrunnin soleiðis, at hon betri samsvaraði við tað, sum var uppgávan hjá Menningargrunninum.

Fólkaflokkurin hevur havt uppskot um ein oyggjamenningargrunn, men í ídnaðarnevndini hevur verið samja, burtursæð frá fólkafloksumboðunum sjálvandi, um, at tað ikki er neyðugt, at gera nakran serligan grunn afturat, men at heimildir eru í lógini um Menningargrunnin, men at hetta bara kann útgreinast meira í reglugerini. Tað var tað, sum uppskotið til samtyktar gekk út uppá, at heita á landstýrið, um at ajourføra reglurnar soleiðis, at hetta her kom við.

Hettar lógaruppskotið, sum nú er lagt fyri tingið, hevur einki við útjaðaraøkini at gera, men tað einasta tað gongur út uppá, er at taka tað heimildina, sum løgtingið hevur til at áseta, hvusssu stór lán, og hvussu stórur studningur kann verða veittur uttan loyvi frá landsstýrinum, at flyta tað frá løgtinginum og út í landsstýrið. Eg má siga, at Sambandsflokkurin er ímóti hasum har. Vit vita tað, at íð hvussu so er, tá ið Javnaðarflokkurin hevur sitið við ræði, tá hevur tað verið ein generellur tendensur oftani at draga heimildir burtur frá løgtinginum og leggja tær út í landsstýrið.

Sjálvandi kann man siga tað, at tað er lættari hjá landsstýrinum at kunna broyta kunngerðina, tí tað kunnu teir gera av sínum eintingum, tað er bara at gera hesa her broytingina og so lýsa hana. Men tað er ikki so torført. Sjálvt um tíðirnar broytast og peningavirði broytist eisini, so er tað ikki nógv fyri, um landsstýri hvørt ár ella annað hvørt, ella triðja soleiðis, sum nú tørvur er á tí, kemur í løgtingið við, einari broyting til § 5 í lógini.

Vit hava nógvar lógir, sum ganga aftur her á hvørjum ári og tað er ikki serliga nógv stríð av tí. Hatta kann landsstýrið uttan nakað serligt stríð, gera við at koma her við einum lógaruppskoti.

Sum sagt, hevur hettar her, lógaruppskotíð einki við útjaðaraøkini at gera, men viðmerkingarnar umtala hesi útjaðaraøkini, næstan bara við umtalu av teinum, og í grundini eru hetta nakrar løgnar viðmerkingar. Tær siga, at tað eru serlig tiltøk, sum mugu haldast neyðug fyri at fremja hesi vinnuskapandi íløgurnar á útoyggjunum, og tað eru væl øll

samd um.

Her stendur eisini við formansins loyvi:

Helst verður neyðugt við serligum ymiskum tiltøkum á teimum einstøku plássunum og roknast má eisini við at, tiltøkini hvørt sær hava fyri neyðini ymiskar heimildir og játtanir. Teir karmar, ið grunnar kunnu arbeiða innanfyri, verða uttan iva ov trongir.

Hetta ljóðar eitt sindur gátuført, tað er líka sum tað býr okkurt aftanfyri her, tað er okkurt í umbúnað, men tað verður ongastaðni nevnt, hvat tað er. Tí allir teir møguleikarnir, sum eru, teir verða ov trongir.

So verður eisini tosað um her, at landsstýrið hevur valt ta loysnina at víðka um virkisøkið hjá Xeningargrunninum. Eg dugi ikki at síigja at tað er komið nakað afturat, sum ikki var áður.

Tað hevur verið heimild alla tíðina til at gera broytingar og tað at hjálpa útjaðaraøkjunum hevur eisini verið møguleiki fyri.

Tí í kunngerðini har stendur eisini, at tað er møguligt at veita hjálp til serlig økir, og har hevur eisini verið møguleiki alla tíðina til at hjálpa útjaðarøkjunum. Hesar viðtøkurnar, reglugerðin fyri grunnin, eru eisini broyttar, og tað er nakað sum eg vil spyrja landsstýrismannin um har. T.d. stendur í kunngerðini í § 3, at nevnd grunsins telur trígjar limir og tríggjar tiltakslimir, men tað stendur ongastaðni, hvør ið velur hesar limirnar, tað stendu í tí gomlu. Eg gangi út frá, at tað má verða dottið buutur úr her, at teir verða valdir av løgtinínum fyri 3 ár, tað stendur ongastaðni, hvar tað er, at tað er tingið, sum velur teir, og at tað er fyri 3 ár.

Í § 4, 3. stk. har sttendur eisini tað sama sum stendur í tí gomlu, at hevur ein nevndarlimur forfall, eigur hann um gjørligt áðrenn nevndarfundin at siga sína hugsan. Formaðurin ger so av um umrøddu mál skulu avgerast á fundinum ella útsetast. Hatta var galdandi, áðrenn tiltakslimirnir vóru komnir, nú eru tiltakslimir komnir, eg veit ikki nær, tað er komið inn í lógina, men tá ið tað er, so er tað væl ikki neyðugt hjá formanninum at fáa meiningina frá tí triðja liminum, tí tá er tiltakslimurin komin inn í staðin, so har má verða nakað, sum hevur verið yvirsæð.

So eitt afturat, í § 13, stk. 7 í hesum javnstøðistíðum, har stendur:

Studningur kann veitast til

upplæring av hjálparmonnum hjá einstøkum virkjum.

Nú hevur landsstýrismaðurin verið yvirí í Oslo og tosað so væl fyrí kvinnunum, eg haldi hann skal gera eina málsliga broyting í hasum har eisini soleiðis, at henda reglugerðin eisini kemur ajour við hesum her.

So er harafturat broyting í reglugerðini, at Menningargrunnurin hevur higartil havt ein skrivara, nú skal hann verða gjørdur til ein stjóra, og O.K. tað er so moderna í okkara tíðum, at annar hvør maður gerst stjóri. Eg havi fyri so vítt eínki ímóti, at hesin verður kallaður stjóri eisini, men tað merkir sjálvandi, at so skulu fleiri fólk, og hann skal hava hægrí løn, og alt tað skal hava størri pláss o.s.v.

Tað hevur eisini verið talað um, útjaðaraøkini, í § 13, stk. 12. Har er greinað nakað út um újaðaraøkini, men sum sagt, heimildin til hetta her hevur verið alla tíðina í § 1, 2. stk. punkt F, men her verður tað eitt sindur meira konkret, og tað kann verða, at hetta her kemur at hjálpa eitt sindur upp á hetta her problemi við útjaðaraøkjum. Tað er neyðugt, at tað verður gjørt, og tað vilja vit eisini ganga við til, men sum sagt, henda lógar-broytingin til flyta myndu-leikan frá løgtinginum út í landsstýrið, meina vit er óneyðug og er óheppin.

Heini O. Heinesen (tf.)

Harra formaður.

Nú er hetta her eitt aftur-vendandi mál um menningargrunn-in, og allir eru líka glaðir við at stuðla útjaðaraøkini. Tað er serliga Fólkaflokkurin, sum hevur lagt uppskot fram tvær ferðir um ein oyggjamenningargrunn, tað hevur so verið í iðnaðarnevndini, og tað hava vit so viðgjørt har.

Vit halda øll sum landsstýrið at broyta reglugerðina fyri menningargrunnin og tað kundi so Anfinn Kallsberg ikki taka undir við seinast. Nú sigur hann, at hann tekur undir við broytingini kortini, tað er Guðsbarn, ið batnar, so hann meinar kanska eitt sindur meira nú tað nærkast valinum hetta hesar oyggjarmenningar-grunnarnar.

Tað, sum eg hongdi meg eitt sindur í, tað er henda her broytingin, hon er ógvuliga lítil, tað stendur soleiðis við formansins loyvi:

Landsstýrið ásetir í teirri í § 7 nevndu reglugerð, hvussu stórt lán, studningur ella

veðhald kann verða veitt einstøkum virki uttan góðkenning frá landsstýrinum.

Eg veit ikki, hvussu hatta skal skiljast um markið niður eftir er slept. Tað kundi landsstýrismaðurin kanska svarað mær uppá, um landsstýrið kann blanda seg upp í, tá tað er niður um markið, sum nevnt er.

So stendur at lesa við formansins loyvi í viðmerkingunum:

Av ti at serlig tiltøk mugu haldast neyðug fyri at fremja vinnuskapandi íløgur úti á útoyggjunum og í útjaðarøkjunum mugu møguleikar fyri víðkan av virkisøki Menningargrunsins ella stovnsetan av einum oyggjamenningargrunni verða kannaðir.

Tað, sum framgongur av lógini um Menningargrunnin hevur verið viðgjørt í ídnaðarnevndini fleiri ferðir. Sum eg segði, so er hatta heimildin, tað stendur, serlig økir skulu mennast. Handa heimildin er har, so eg kann ikki rættiliga skilja, hví man skal hava ein oyggjamenningargrunn bara fyri at spjaða ta fíggjarorku, sum er.

Eg vildi hildið tað, at tey økini, sum eru so ógvuliga gevandi at gera íløgur í, tey skuldu saktans kunna borið útjaðaraøkini. Tað er væl meiningin við einum samfelag, at tað eru tey sterku, sum bera tey veiku uppi, so hatta har við oyggjamenningargrunni, hatta havi eg als ikki skilt nakrantíð, at tað altíð skula verða sendar rokningar út til skattaborgaran. Man kundi eisini latið bankarnar borið nakað av hesum her. So stendur seinast í viðmerkingunum, eg eri eitt sindur ivasamur í, um hetta er rætt, sum stendur her, við formansins loyvi:

Landsstýrið metir, at nú, privatu peningastovnarnir fara at taka sær_meiri av at veita rakstrarlán, ið menningargrunnurin hevur verið nakað einsamallur um, fer Menningargrunnunum helst ikki at tørva eykajáttan ella landsheimildir fyri at stuðla útjaðaraøkjunum samb. víðkaðar heimildir.

Eg trúgvi einki uppá, at bankarnir eru so rundhandaðir við at váða nakað har, tað seti eg eitt stórt spurnartekin við.

Eg taki undir við at broyta hettar her soleiðis, at tað kann verða eitt sindur liðiligt soleiðis, at man kann hjálpa útjaðaraøkjunum. Men so stendur at lesa her, at nevnd grunsins telur tríggjar limir og tríggjar tiltakslimir, og skulu teir hava góðan kunnleika

til íðnað.

Nú var einaferð eitt uppskot her í tinginum, tað kom eisini frá landsstýrinum, har stóð, at teir skuldu vera bæði eitt og annað, eg veit ikki, ein skuldi vera juristur, og tað uppskoti kundi eg so ikki takað undir við. So faktiskt dámar mær hesa orðingina betri, men hatta har stendur eisini í samband við lógina um (eg veit ikki, hvussu hon eitur, Menningarstovan umsitur tað lógina, tað er menningarráð).

So stendur at lesa her í stk. 3, § 4.

Hevur nevndarlimur forfall, eigur hann um gjørligt áðrenn nevdnarfundin at siga sína hugsan.

Formaðurin ger so av, um umrøddu mál skulu avgerast á fundinum ella útsetast til seinni fund. Tað vil siga, nan her gevur formannnum loyvi til, at tað er hann, sum avgerð, hvørji mál skulu ígjøgnum. Vit kenna allir hatta har, tað er bara at bíða, til tann ávísi limurin møtir upp í bygdarráðnum ella okra aðrastaðni, so kann man fáa eitt mál í gjøgnum, sum ikki fæst ígjøgnum á annan hátt, og nú er tað upp til formannin at avgera, hvørji mál skulu ígjøgnum. Um formaðurin vil at eitt mál skal ígjøgnum, so sigur hann sum so, at nú er hesin limurin úti, og nú viðgera vit málið. Eg veit ikki, um tað er neyðugt við hasi regluni har.

So er tað § 5. Nú eri eg ikki so málkønur, men tá man hevur hoyrt hesa orðingina, so stendur her:

Fundarfrágreiðingin verður førd í gerðabók, ein minniluti kann krevja sína støðu tiknað við í gerðabókina. Vanligt er at fáa sína støðu førda í gerðabókina, tað vildið eg hildið var betri at, tikið við, eg veit ikki, hvussu tað skal skiljast. Hatta er so ein nýggj orðing í mínari verð, tá man tosar um gerðabók.

Annars skal eg ikki gera so nógvar viðmerkingar til hetta her, eg havi ikki sett meg so nógv inn í hesa broytingina, skal eg vera púra ærligur, tí málið hevur ligið her suðuri, men eg vil mæla til at málið fer í Íðnaðarnevndina, og har fáa vit høvi at viðgera tað nágreiniliga, og har skal Tjóðveldisflokkurin geva tí eina góða viðgerð.

Jákup Lindenskov (jv.)

Harra formaður.

Tað er broyting í lógini um Menningargrunnin, sum vit viðgera í løtuni. Eg skal fyri Javnaðarflokkin boða frá, at vit

taka undir við málinum og vilja viðgera tað í nevndini, tað verður væl Ídnaðarnevndin, sum kemur at viðgera málið.

Menningargrunnurin varð stovnaður júst fyri 15 árum síðani, og tað er rætt, sum Eilif Samuelsen segði her undir viðgerðini, at hvørja ferð, ið Javnaðarflokkurin var í landsstýrinum, so vóru tað nógv mál, sum vóru drigin í landsstýrið. Tað er rætt, at tað vóru nógv mál, sum komu frá landsstýrinum og eru komin frá landsstýrinum, tá Javnaðarflokkurin hevur sitið í landsstýrinum, og soleiðis var eisini, tá hesin grunnurin kom, og tá Ídnaðargrunnurin kom, tí tað vóru ógviliga stórar áneyðir tá, at fáa sett á stovn fíggingartiltøk, sum kundu birt upp undir eina menning av Ídnaðinum í Føroyum.

Vit høvdu tá nógvar og drúgvar samráðingar og samrøður við allar møguligar stovnar og peningastovar ikki minst, og vit fingu tá at vita frá peningastovnunum, serliga frá bankunum, serliga frá tí eina bankanum, at teir ikki høvdu nakra sum helst tiltrúgv til, at Ídnaður var nakað, sum kundi loysa seg í Føroyum, so frá teirra síðu skuldi ikki væntast, at nakað fór at henda til frama fyri uppbygging av Ídnaði, tað vóru heilt týðulig og klár boð. Tað var eisini ein av orsøkunum til, at vit mettu tað vera so avgerandi neyðugt at fáa fíggingarstovnar til Ídnaðin. Vit settu tá Ídnaðargrunnin á stovn og stutt aftan á í 1973 kom so Menningargrunnurin, sum eitt framhald av teimum tiltøkum, sum vóru gjørd við Ídnaðargrunninum.

Vit halda sjálvsagt, at tað er neyðugt, at málini koma fram í løgtinginum, og eru vit sjálvsagt altíð fúsir til at taka øll møgulig mál upp í samband við Ídnað, tá ið tað verður hildið neyðugt í tinginum, men vit halda, at tað má verða heilt natúrligt, at tað er tann polittiska umsitingin, sum fylgir við í tí dagliga og fær heimildir soleiðis, at Ídnaðartiltøk, sum skulu fremjast frá tí almenna, kunnu ganga soleiðis hond í hond og ikki hvørja ferð skulu bíða eftir í hvørji einastu likkju at verða viðgjørd í tinginum, tí tá verður ikki nógv praktiskt møguligt at broyta.

Tað varð nevnt her, at tað vóru onkrir manglar í reglugerðini, eg vil bara vísa á, at tað haldi eg nú ikki. Hetta ein ein reglugerð, sum vit her skulu viðgera meira enn júst broyting í lógini, tað er ein broyting.

Tað stendur týðiliga í § 3 í sjálvari løgtingslógini, hvussu nevndarlirmínir skulu veljast og tað er løgtingið, sum velur.

Eg vil mæla til, at málið verður viðgørt í nevndini, og verður avgjørt í hesari tingsetini.

Asbjørn Joensen (sj.)

Harra formaður,

Hetta her eitt mál, sum stingur seg upp til tíðir, vit hava verið vitnir til ymisk uppskot her á tingi í samband við, at menna á útjaðarinum, ymiskt uppskot, sum hava gingið út upp á at lætta um skatta- viðurskiftir v.m., sum gjørdu íløgur á útjaðaraøkinum.

Eg havi ongantíð verið í iva um, at teir grunnarnir, sum vit hava, sum eru almennir, og sum fyri sín stóra part fáa sín pening av figgjarlógini, hava og eiga møguleikar fyri at mennast alastaðni í Føroyum, har tað er fyri neyðini.

Onkrar broytingar eru ivaleyst gjørdar í hesum uppskoti, sum her fyriliggur, tað skilji eg á røðarunum, og eg gangi út frá tí, at tað er til tað betra. Millum annað legði eg merki til nakað, sum ikki var nakar bati í, og tað var hendan nevndin hjá Menningargrunninum, sum støðugt var triggir limur, men tað sigst at verða betur, nú Menningargrunnurin umsitur so stórar peningaupphæddir, at tað vóru 5 limir soleiðis, at teir umboðaðu ein størri part av oyggjasamfelagnum enn sum nú.

Viðvíkjandi tí, sum Fólkaflokkurín hevur ført fram, at teir hava eitt uppskot í hesum sambandi, so tosar man har mest um tann partin av samfelagnum sum hava ringast sambandsmøguleikar við meginøkið. Nú veit eg ikki, um man hugsar um nakað ávíst, men um man fer at definera hatta har, kann tað verða eitt sindur torført, tí um man nú tók Kalsoynna, tá hon hevur fingið sítt ferjusamband í lagi, so hevur hon júst somu samvinnumøguleikar við meginøkið, sum allar Noroyggjarnar hava í gjøgnum Klaksvíkina.

Tað vil siga, so gongur handan oyggin út eftir tí mynstrinum, sum eg helt Fólkaflokkin skitsera, og tað kann væl ikki verða meiningin.

Men tað, sum eg vildi sagt við at komið upp í hetta kjakið, tað er nakað heilt annað, tað er ikki hesar peningaupphæddirnar, tað er faktiskt í minari verð næstan nonsent at tosa um.

Kemur eitt kløkt

projekt uttan mun til, hvar tað kemur frá her á landi, so eigur tað at verða stuðlað, um so er, at tað hevur búskapandi og mennandi týdning fyri tað økið, tað kemur frá. So kann man gera reglugerðir, júst sum man vil, man kann draga málið úr tinginum út í Tinganes, um man vil ella ikki, tað er úrslitið, sum telur, men eg eri samdur við Eilif Samuelsen, tá ið hann nevnir nakað um, at vit eru við til at lata ov mikið av tí politiska valdinum frá okkum út til tað stýrandi úti í Tinganesi.

Men tað, sum eg vil, tað er faktiskt at seta eín spurningur til landsstýrismannin í tollmálum?

Nú veit eg ikki, hvat tað er fyri ein vinna, ið talan kann verða um úti í útjaðarinum.

Eg havi hoyrt ymiskt í míni tíð, sum politikari skuldi man m.a. onkústaðni gera smá tannhjól til urverk o.t. Eg má siga tað, at eg dugdi ikki at síggja tað klientellið úti á bygd, sum kundi fara undir tað handverkið, men lat tað fara.

Um so verður, at hetta her skal verða búskaparliga mennandi og eisini skal verða mennandi fyrí bygdasamfelagið, so er tað eín faktor, sum vit mugu taka við, og tað er, um hetta fyritaksemið hevur nakran sum helst livimøguleika í framtíðini.

Sum er nú, so hevur henda samgongan gjørt tað, at hon hevur broytt tollskipanina til fantastiskan fyrimun fyri smávirkir úti í útjaðaranum ella í landinum sum heild, og tað eiga tey tøkk fyri. Tey hava styrkt tey á tann hátt og broytt tollín soleiðis, at okkara smávirkir kunnu vera við í kapping við tað, at tollskipanin er broytt. Vit kunnu vera við í kapping á tann hátt og búskaparliga geva nakað til samfelagið, við at vit kunnu skapa arbeiðspláss, vit kunnu gera nakað skapandi fyri tað, sum annars vildi farið til sølumenn beinleiðis. Men tað, sum eg havi varhugan av, er tað, at vit kunnu vænta broytingar í tollskipanini aftur til tað verra, og tá hava føroyskar fyritøkur, smáfyritøkur, sum hesar verða, ongan verðsins kjans til at yvirliva. So er spurningurín, hvar er so kjansurin fyri at kunna styrkja og menna, ella mugu vit taka tað við inn í myndina og siga, at tit kunnu gott stápla nakað upp nú, tit hava 10 ár, so er hatta har úti av myndini, tí tit hava ikki møguleika fyri fíggjarliga at taka upp táttin mótvegis teimum, sum koma við vøruni uttanífrá. Eg haldi, at tað er týðandi og eg kundi væl hugsað mær, at landsstýrismaðurin í

tollmálum kanska líka sum dróg hetta her inn í myndina soleiðis, at tað antin var eggjandi fyri fólk í útjaðaranum ella eisini hin vegin, at teir fingu rein boð um, at vit kunnu gera menningargrunn júst, sum vit vilja. Vit kunnu stuðla tykkum so nógv, sum vit vilja, men tit hava neyvan nakran møguleika, um ikki ein stórur partur kemur úr landskassanum, og tá verður tað líka sum eitt sindur meira kámt tað heila eftir mínari meting.

Takk fyri, harra formaður.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Tað er hetta uppskotið nr. 17: Broyting í løgtingslóg um Menningargrunn ídnaðarins, sum er til viðgerðar.

Tað er at fegnast yvir, at eitt slíkt uppskot er komið niðan á ting her og til viðgerðar í dag, tí at tað frangongur týðuliga av hesum uppskotið, at hetta er til fyrimuns og kemur at verða til fyrimuns fyri íløgur á útjaðaraøkinum. Tað hevur verið nógv tosað í samb. við hetta við at urbanísera í mun til, hvønn stuðul útjaðaraøkir eiga at fáa. Eitt er givið, at skulu vit varðveita tað mynstrið, sum hevur eyðkent ta føroysku skipanina, og skulu vit ikki ganga tann vegin, har vit næstan fara at fáa ein ella fleiri høvuðsstaðir í landinum, so er tað lívsneyðugt, at skilagóð virkir, skilagóðar íløgur á útjaðaraøkinum verða stuðlað, ja, í ávísum føri fáa fyrimun, og sum tað eisini framgongur her, har sagt verður við formansins loyvi at lán samb. stk. 3 og 4, sum verða veitt til virkir í útjaðaraøkínum, kunnu veitast við eini rentu, sum liggur 2% undir vanligu útlánsrentu grunsins. Hetta taki eg fult undir við og hetta skal landsstýrið hava takk fyri. So vil eg við hesum siga frá, at eg taki undir við uppskotinum, hvat hasum viðvíkur, men tað er rætt, sum eisini hevur verið inni á, at man eigur at umhugsa, hvørt tað er skilagott at frátaka løgtinginum tann møguleika og tann myndugleika í slíkum málum, sum tað hevur og fyri at leggja tað út í landsumsitingina.

Nú hava vit havt fleiri dømi her á tingi tey seinastu árini, har man hevur innkallað fíggjarnevndina, har avgerðarrætturin hevur ligið hjá landsstýrinum frammanundan, men har menn so hava skoytt upp í við lógarbroytingun, at avgerð

liggur hjá landsstýri og fíggjarnevnd. Við øðrum orðum, man hevur minimerað ella avmarkað avgerðarrættin hjá landsstýrinum, og eg haldi, tað er rætt og gott, og tí taki eg undir við Eilif Samuelsen í hansara sjónarmiðum, hvat tí viðvikur.

Men harra formaður. Tað, sum fekk meg at taka orðið í hesum máli, tað var hesin afturvendandi spurningurin viðvikjandi útjaðaraøkjunum.

Nú var tað soleiðis, at í februar mánað 1988 legði landsstýrið eitt uppskot fram á ting tað var løgtingsmál nr. 65: Løgtingslóg um útjaðarafiskavirkir. Endamálið við tí var eisini, sum tað framgongur av viðmerkingunum, við formansins loyvi, at flakavirkir í útjaðaraøkjunum hava serligar trupulleikar at takast við og so verður sagt, higartil hevur studningur verið givin til tær eykaútreiðslur, sum standast av at flyta fisk til útflutningshavn. Í løtuni fer fram ein miðsavnan í flaka- og fiskavirkisidnaðinum. Skip verða keypt frá einum plássi til annað. Við teimum reglum, sum eru fyri útskifting av skipum og fiskiloyvum, merkir hetta, at meira av råvøruni verður drigin til tey størru flakavirkini. Tað kann tí av bygdamenningarpolitiskum orsøkum verða neyðugt at gera størri mun á útjaðarafiskavirkjum og øðrum virkjum, enn higartil hevur verið gjørt í almennu studningsskipanini við núgaldandi løgtingslóg um útjaðarafiskavirki.

Hatta vóru orðini í sambandi við viðmerkingarnar. Í sjálvum lógartekstinum varð sagt í § 2: Landsstýrið verður heimilað at veita útjaðarafiskavirkjum studning, herundir flutningsstudning og landingarstudning og tíðaravmarkaðar studningar til umleggingar í framleiðsluni.

Alt hetta hevði til endamáls at styrkja støðuna í útjaðaraøkjunum. Hetta málið fekk viðgerð her á tingi og tað fór í nevnd, í fíggjarnevndina, har tað eisini varð viðgjørt. So hevndi tað, at fíggjarnevndin 4. mai sendir álitið niðan í tingið, har fíggjarnevndin, ein samd nevnd, kemur til ta niðurstøðu, at málið skal sendast aftur til landsstýrið til gjøllari viðgerð, og at landsstýrið leggur málið fram fyri tingið í ólavssøkutingsetuni.

Eg fari at loyva mær at spyrja landsstýrismannin, tann sama, sum hevur lagt hetta uppskotið fram um menningargrunnin: hvat varð av løgtingslóg um útjaðarafiskavirkir? Kann tað hugsast, at tað, sum fíggjarnevndin vísti á tá, verður

realiserað, at landsstýrið nú, áðrenn tingið fer heim, eg havi skilt, tað verður skjótt, kemur niðan aftur í tingið við einum uppskoti, sum er til gagns fyri útjaðarafiskavirkini? Tað er tørvur á hesum uppskoti, var tað tá, so er tað ikki minni í dag.

Tordur Niclasen (kfff.)

So henda spurningin fari eg at loyva mær gjøgnum formannin at stilla landsstýrismanninum í hesum máli. Takk fyri.

Vilhelm Johannesen (jv)

Harra formaður.

Eg skal takka framsøgumonnunum fyri eina sakliga og positiva umrøðu av hesum lógaruppskoti.

Tað er rætt, sum tað verður sagt, at sjálvt lógaruppskotið ikki hevur so nógv við oyggjamenning ella útjaðaraøkir at gera, men orsøkin til, at landsstýrið hevur lagt eitt uppskot til nýggja kunngerð fyri Menningargrunnin, sum fylgiskjal til lógaruppskotið er tann, at hesin spurningurin fleiri ferðir er umrøddur her á tingi.

Sum tað er nevnt undir hesum orðaskiftinum, so legði Fólkaflokkurin í síni tíð, ið hvussu so er einaferð, eg veit ikki, um tað hevur verið 2 ferðir frammi, eitt uppskot um oyggjamenningargrunn, og mín støða var tann, at tað var óneyðugt at stovna ein grunn aftur at fyri sama økið. Vit hava jú Ídnaðargrunnin og vit hava Menningargrunnin og eg mælti tá til, undir tí orðaskiftinum, sum tá var, at vit heldur skuldu endurskoða lógina ella kunngerðina um Menningargrunnin fyri at fáa gjørt nakrar serligar reglur fyri útjaðaraøkini.

Landsstýrið er komið til ta niðurstøðu, at tað ikki var neyðugt at gera nakra broyting í lógini fyri at fáa nakrar serligar reglur fyri útjaðaraøkini. Men hin vegin so hildu vit, at tað var rætt at broyta lógina á hesum her eina økinum og tað er tað, at sambært galdandi lóg, so skal landsstýrið í løgtingið, tá ið grein 5. skal broytast, og tað er grein 5. ,sum sigur, at Menningargrunnurin ikki kann játta óavmarkaðar upphæddir í láni, ikki kann veðhalda óavmarkað og ikki kann veita óavmarkaðan studning uttan við loyvi frá landsstýrinum.

Tá ið lógin fyri Menningargrunnin kom í 1973, tá var tað soleiðis, at lánti Menningargrunnurin meira enn 500.000 kr. í einum einstøkum føri, so skuldi landsstýrið góðkenna lánið, og veðhelt Menningargrunnurin fyri meira enn 1 mió.kr. í einstøkum føri, so skuldi landsstýrið góðkenna, at veðhaldi var givið. Seinni er so lógin broytt soleiðis, og tað er tað,

sum nú er í galdandi lóg, at fór ein lánveiting upp um 1 mió.kr., so kravdist loyvi frá landsstýrinum og fór eitt veðhald upp um 2 mió.kr., so kravdist loyvi frá landsstýrinum.

Eftir lógaruppskotinum, sum fyriliggur her, so verður tað ikki lógin, sum skal áseta hesa regluna í framtíðini, men kunngerðin, og tað vil siga, at landsstýrið við broyting í kunngerðini kann áseta nýggjar dagførdar upphæddir inn í kunngerðina. Tað, sum ætlanin er nú, er at broyta 1 mió.kr. til 2 mió.kr., tað vil siga, at tá ið Menningargrunnurin játtar lán, sum er størri enn 2 mió.kr., so skal loyvi til frá landsstýrinum, og hetta er sum kunnugt í løtuni 1 mió.kr. og tá fí grunnurin játtar meira enn 3 mió.kr. í veðhaldi, tað er í løtuni 2 mió.kr., so skal eisini loyvi til frá landsstýrinum.

Men, sum eg segði í áðni, orsøkin til, at vit løgdu uppskotið til nýggja kunngerð við har, tað er tað orðaskiftið, sum hevur verið her í tinginum um oyggjamenning og um útjaðaraøki. Tá vit ganga hesa kunngerðina í gjøgnum, síggja vit ymiskar broytingar, t.d. í grein 3, har verður sagt, at nevnd grunnsins telir 3 limir, og 3 tiltakslimir, og skulu teir hava góðan kunnleika til ídnað. Hetta er ein ajourføring, tí 16. januar í 1980 samtykti løgtingið, at broyta lógina soleiðis, at nevndarlimirnir vóru 3 og tað er also óbroytt í mun til, hvat tað var framanundan, men tað nýggja í broytingini frá 1980 er, at 3 tiltakslimir skulu eisini veljast og hetta stendur í løgtingslóg frá 30. januar 1980. So spyr onkur, um grein 4. stk. 3, har stendur, hevur nevndarlimur forfall, eigur hann um gjørligt áðrenn nevndarfundin at siga sína hugsan, formaðurin ger so av, um umrøddu mál skulu avgerast á fundinum ella útsetast til seinni fund.

Eg haldi, tað var Eilif Samuelsen sum vísti á hatta og helt, at tað var óneyðugt at hava hasa regluna, nú ið nevndarlimirnir hava sínar tiltakslimir og tað kann verða nakað um tað sjálvandi, men hin vegin kunnu vit eisini koma í ta støðu, at nevndarlimurin er sjúkrameldaður fyri longri tíð, at tiltakslimurin hevur forfall, og í tí førinum er so eingin, sum kann møta, so eg veit ikki, um tað ger nakað, um hatta stendur. Tað er landsstýrið, sum endaliga skal samtykkja kunngerðina um Menningagrunnin, og hetta, sum liggur her sum

fylgiskjal, er eitt uppskot, sum landsstýrið enn ikki hevur samtykt. Tí vilja vit taka tað við í viðgerðina, sum kemur fram her undir orðaskiftinum og eisini handa spurningin, um tað framvegis er neyðugt við grein 4, stk. 3.

Tað eru onkrar aðrar broytingar í hesum uppskotinum til kunngerð, sum stava frá lógarbroytingum, ið eru gjørdar hesi seinastu árini, meðan kunngerðin ikki hevur verið til viðgerðar og ikki er ajourført í mun til tær broytingar, sum eru gjørdar í lógini.

Eitt nýtt í hesum uppskotinum til kunngerð er tað, at nú skal Mennningargrunnurin hava ein stjóra, onkur hevur verið inni á tí spurninginum. Tað er soleiðis, at miðskeiðis í seksti árinum fingu vit Húsalánsgrunnin og í lóg og kunngerð fyri Húsalánsgrunnin stóð, at grunnurin hevði eitt stýri við 3 limum og grunnurin kundi taka sær lønta hjálp. Tað gjørdi Húsalánsgrunnurin, hann tók sær lønta hjálp, tað fyrstu tíðina eitt fólk í hálvtíðarstarv, seinni varð tað fulltíðarstarv, og at enda sum virksemi og stovnsfæið hjá Húsalánsgrunninum vaks, so varð talan um at seta ein stjóra. Menningarstovan, sum hevur havt hetta her til ummælis, er tann, sum er komin við uppskotinum um, at gera skrivaran í Menningargrunninum til stjóra, og grundgevingin frá Menningarstovuni er, at Menningargrunnurin er ógvuliga paralellur við Húsalánsgrunnin. Hann byrjaði nøkur ár seinni í 1973, og tað stóð upprunaliga í lóg og kunngerð, at grunnurin hevur eitt stýri upp á 3 limir, og stýrið kann taka sær lønta hjálp. Nú er virksemið hjá Menningargrunninum eisini vaksi í sama mun sum hjá Húsalánsgrunninum, og tí heldur Menningarstovan, at tað er bara ein veruleiki, skrivarin er stjóri í dag í veruleikanum, og hví ikki bara taka og seta tað í kunngerðina.

Síðan er tað útjaðaraøkini. Har hevur onkur víst á, at tað var ikki neyðugt at gera nakrar broytingar, tí at í galdandi lóg og galdandi kunngerð fyri Menningargrunnin var heimild til at stuðla útjaðaraøkini, og tað er partvíst rætt, men bara partvíst rætt, tí tað sum Menningargrunnurin í galdandi lóg og kunngerð hevur heimild til, tað er eina ferð at veita stuðul til eitt virki, og tað kann verða eitt útjaðaravirki eins væl sum okkurt annað virki. Men tað, sum vit gera nú, tað er tað, at vit geva

Menningargrunninum heimild til at veita nakrar heilt serligar sømdir til virkir í útjaðaraøkinum. Um vit lesa 12. stk. í grein 13, við formansins loyvi, so stendur, at umframt tann í 2. stykki nevnda studning, kann studningur veitast við upp til 15% av íløgukostnaðinum til stovnan av virkjum í útjaðaraøkjum ella, um ein flytur virki frá meginøkinum til útjaðaraøkið. Hesín studningur verður eftir 5 árum lagdur um til vanligt veðrættarlán, sum viðkomandi virki eftir nevndu 5 ár og eftir metan nevnd menningargrunsins hevur rentabilitet í rakstrinum. Skiftir virki eigara við sølu innanfyri ásettu 5 árini, fellur allur studningurin til gjaldingar beinavegin, o.s.fr.

Hetta er tað, sum grunnurin hevur havt heimild til framman undan at veita ein slíkan studning, her verður tað bara ásett, at tað skal verða upp til ella í mesta lagi 15%, men taka vit so 13. stk. í somu grein, so stendur, lán sambært stk. 3. og 4. sum verða veitt til virkir í útjaðaraøkinum kunnu veitast við eini rentu, sum liggur 2% undir vanligu útlánsrentu grunnsins og sum annuitetslán, og hasa heimildina hevur Menningargrunnurin ikki í galdandi lóg og galdandi kunngerð. Eg kann upplýsa, at Menningargrunnurin hevur ymiskar rentusatsir, tá ið talan er um íløgulán til bygningar, so er rentan 8,5%, tá talan er um íløgulán til rakstrargøgn maskinur og innbúgv, so er rentan 9,5% og tá talan er um onnur lán, rakstrarlán, so er hon, ja eg haldi hon er 11 3/4% eg eri ikki heilt vísur í tí, men tað haldi eg. Tað vil siga, at er talan um eitt útjaðaravirki, so kann rentan til íløgulán í ein bygning verða 6,5% í staðin fyri 8,5%, og tá talan er um íløgulán til maskinur og amboð, so kann hon verða 7,7% í staðin fyri 9,5%. Fara vit so víðari og taka 14 stk. í grein 13, so stendur har við formansins loyvi. Studningur kann veitast til flutning av virki og virkisgøgnum úr meginøkinum til útjaðaraøkini, studningurin má ikki fara upp um 70% av flutningskostnaðinum herumframt kann studningur til flutning av rávørum og liðugtvørum veitast 3 tey fyrstu árini til nýstovnað virki í útjaðaraøki. studningurin kann í mesta lagi verða 153 hægri enn veruligi meirflutningskostnaðurin av at liggja í útjarðaraøki.

So kemur stk. 15, nevnd grunsins avgerð í hvørjum einstøkum føri, hvat meinast við

útjaðaraøki og meginøki. Handa spurningin umrøddi háttvirdi løgtingsmaður Anfinn Kallsberg, hann fýltist á, at tað ikki var greitt definerað í uppskotinum til kunngerð, hvat er meginøki og hvat er útjaðaraøki, tað er sjálvandi trupult at seta heilt greiðar linjur fyri. Ein kundi sjálvandi hugsað sær at sagt, at útoyggjar, sum ikki hava vegasamband Mykines, Fugloy, Svínoy, Hest, Koltur, Nólsoy o.s.fr. Sandoyggin møguliga við, tað eru útjaðarar, og restin er ikki útjaðarar. Men hvat so við t.d. Gásadali, sum væntandi fær vegasamband ella Tjørnuvík, Gjógv, Kunoy o.s.fr. Orsøkin at hatta ikki er komið við, er tann, at tað er so torført at definera, men nú hava vit jú sagt, at uppskotið til kunngerð, at stýrið fyri Menningargrunnin kann veita lán, sum eru 2% bíligari, kann veita studning upp til 15% íløgustudning, og kann veita flutningsstudning, tá ein flytur virki í útjaðaraøki upp til 70%. So kann grunnurin eftir hesum, sum fyriliggur meta, er tað talan um eitt virki í Fugloy, so játta vit fult tað, sum vit hava heimild til. Er talan um eitt virki á Víðareiði ella norðuri við Gjógv, so kunnu vit játta tað luttvíst og siga, í staðin fyri at geva tykkum 2% lægri, so geva vit tykkum 1% lægri rentu, í staðinfyri at geva tykkum 15%, so geva vit tykkum 10% í studningi o.s.fr.

Ja, so var tað Eilif Samuelsen, sum vísti á, at í uppskoti til kunngerð, stendur hjálparmenn, hatta skulu vit nokk rætta til hjálparfólk. Eg fekk ein beinleiðis spurning frá Tordi Niclasen, tað var um lógaruppskotið um útjaðarafiskavirkir, hann spyr, hvat varð av tí uppskotinum tað var framlagt av landsstýrinum seinastu tingsetu, málið var beint í figgjarnevndina. Ein trupulleikin við tí uppskotinum var tann sami, sum vit hava umrøtt her í dag, hvussu kunnu vit definera, hvat er útjaðari og hvat ikki er útjaðarí, og tað var heldur ikki greitt definera í tí uppskotinum tí hatta verður altíð ein metingarspurningur, hvat skal koma undir útjaðara, og hvat ikki. Tað uppskotið var, sum Tordur Niclasen, háttvirdi løgtingsmaður nevndi, viðgjørt í figgjarnevndini og var eftir tilmæli frá figgjarnevndini sent aftur til landsstýrið, og landsstýrið var biðið um at leggja málið fram aftur í ólavsøkutingsetuni. Nú havi eg fingið tað fatan, at henda her stutta ólavsøkutingsetan fer

ikki at viðgera hesi málini endaliga. tey fáa eina fyrstu viðgerð og fara so í eina nevnd og koma so sjálvandi framaftur, tá eitt nýtt løgting er valt. Men eg kann siga so mikið um tað uppskotið, at vit arbeiða við tí í Tinganesi og vit ætla, at tað skal liggja klárt soleiðis, at tað kann takast fyri, tá ið tingið kemur saman aftur aftan á løgtingsvalið í november. Takk fyri.

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður.

Eg fari at takka landsstýrismanninum fyri, at hann royndi at definera, hvat hetta her lógaruppskotið fevnir um.

Tá ið vit løgdu uppskot okkara nr. 93, 1986, fram so søgdu vit m.a. í viðmerkingunum, at vit eru samdir um, at hesir væntandi vinnumøguleikarnir ikki einans eru á teimum plássum, ið hetta lógaruppskotið umfatar, men vit hava valt at byrja har sum størsti tørvurin er. Tá tað snúði seg um útoyggjarnar var tað púra krystalklárt definerað hvørji pláss í landinum, tað snúði seg um.

Tað, sum uppskotið hjá landsstýrinum um broyting í reglugerðini, gongur út upp á, vil eg siga og definera, sum tað næsta stigið, nevnliga útjaðaraøkini inni á meginøkinum, og tað eri eg fullkomiliga samdur í, at tað eigur man at stuðla og taka undir við. Men sum tað hevur verið ávíst her, vit hava havt eitt uppskot í fíggjarnevndini um útjaðarafiskavirkir og ein grundin til, at tað hevur verið so vanskiligt at koma í gjøgnum við tí málinum er nevniliga definatiónin, hvørji virkir er tað, sum koma undir hesar reglur, og tað verður júst tað sama, tá hesar reglurnar verða settar í gildi. Tað kemur at verða ein hanakampur og tað kemur at verða upp til stýrið í Menningargrunninum at avgera, hvat eitt útjaðaravirki er. Eg eri bangin fyri, at tað verða nevndarlimirnir í Menningargrunninum, hvar teir lokalt koma frá, sum koma at avgera, um eitt nú Suðuroyggin ella Vágarnar ella Sandoyggin ella Norðuroyggjar eru eitt útjaðaraøki, og tí verður tað ógvuliga tilvildarligt, men eg eri samdur í, at man eigur at opna hesar møguleikarnar. Eg fari at mæla til, at hesar broytingarnar í reglugerðini verða tiknar við, og at tær verða settar í verk, eg eri ikki samdur við Heina O. Heinesen, men eg vil enn eina ferð undirstrika, at

oyggjamenningargrunnurin eigur eisini at koma soleiðis, at vit fáa gjørt eina serliga skipan fyri útoyggjarnar, har sum tað allar ringast stendur til vinnuliga. Skulu vit bjarga búðsetingini á útoyggjunum, so er neyðugt at gera nakrar ógvusligar ábetur fyri at skapa nøkur pláss har úti, og tað vil eg siga, at okkara uppskot ger. Tá ið menn nú eru bangnir fyri, at administratiónin verður ov dýr, so hava vit júst lagt okkum eftir í okkara uppskoti, at uppbygningurin av tí er mett tann sami, sum av Menningargrunninum og tað er eínki til hindurs fyri, at Oyggjamenningargrunnurin verður umsitin av Menningargrunninum yvir høvur einki. Men har verður bara greitt difinera í lógini, hvat tað eru fyri virkir, hvør kann fáa tað, og tað verður avsett á fíggjarlógini ein serlig upphædd til hesar útoyggjarnar, so einfalt er tað.

Tá ið Heini O. Heinesen, eg má geva honum eitt lítið aftursvar, eg ætlaði ikki at gera tað, men eg má gera tað, tá ið hann sigur, at eg ikki tók undir við uppskotinum hjá samferðslunevndini um at lata landsstýrið kanna hesi viðurskiftini, so er tað fullkomiliga rætt, tí eg visti tað, at tá ið tað kom aftur her í tingið, ella nýttist ein tá ikki at verða komið í tingið, so var tað eitt neyðaregg og tað er framvegis eitt neyðaregg fyri útoyggjarnar. Tá ið Heini O. Heinesen ikki hevur skilt tankarnar við oyggjamenninga grunninum, so harmar tað meg, at hann ikki hevur gjørt tað, hann situr sum formaður í ídnaðarnevndini, sum viðger hetta málið, og eg haldi, at um tað ikki hevur gingið upp fyri honum, at tað stendur illa til arbeiðsliga úti á útoyggjunum, so er tað upp á tíðina, at hann finnur út av tí.

<u>Heini O. Heinesen</u> (tf.)

Harra formaður.

Eg skal takka Anfinni Kallsberg, at hann brúkti so nógva tíð upp á at viðgera meg í samband við hetta her, at eg ikki hevði skilt meiningina við einum oyggjamenningargrunni. Eg havi skilt meiningina sera væl. Men eg kann gott vísa á, at vit hava ein grunn, sum eitur jarðargrunnurin og hann lánir út til lægstu, og tað eru 40 ára lánstíð. Hvussu nógv hevur hesin grunnurin megnað at stuðlað útjaðaraøkini? Hetta er bara eitt dømi og har er ómetaligir nógvir pengar útlántir, eg veit ikki hvussu nógvir pengar standa úti,

also tøl hava verið nevnd, eg havi bara gloymt tað, tað er so ótrúligt, men hvat hevur hann stuðlað úti í Fugloy úti, í Svínoy úti i Mykinesi og aðra staðir? Hvat hevur hann megna? Oyggjamenningargrunnurin hevði verið tann sama tvøgan, sum hatta har til at stuðla útjaðaraøkini. Nei, tað eru meginøkini, sum alla tíðina verða stuðlað.

Tá ið vit hava eitt samfelag, hvat er so tankin við at hava eitt samfelag? Tað er ikki sjálvdráttur, tað er at arbeiða saman, tey sterku økini skulu bera tey veiku, tað er tað, tað snýr seg um. Tað er hetta her, sum Anfinn Kallsberg hevur misskilt. Mín tanki er tann, at tey økini, sum tað er gevandi at gera íløgur í, nú hevur grannskoðarin hjá Menningargrunninum, sum eisini er fólkafloksmaður, reypað sær av, hvussu ábyrgdarfult hetta her er rikið, hesin her grunnurin sum eitur Menningargrunnurin. Eg veit ikki, um hann hevur rakstraravlop ella, hvat hann hevur. Men hvat er meira náttúrligt enn um hann hevði eina ávísa forrætning, tað hevur skrivarin eisini gjørt, hann er jú javnaðarmaður. Hvat var meira náttúrligt enn at brúkt hesar pengarnar til at stuðla útjaðaraøkini, og tað er tað, sum hetta her, hugsi eg, er tankin hjá landsstýrismanninum, at man kann brúka nakað av hesum her til at stuðla útjaðaraøkini við, so hatta har við at liggja og spjaða hetta sundur, tað vil eg siga, tað gevur yvurhøvur onga meining, her meini eg, man skal lyfta i felag og um nú t.d. tey góðu økini ikki kunna hjálpa til at lyfta útjaðaraøkini, so verður alt burtur har, og tað er væl á veg. Anfinn Kallsberg nýtist ikki at siga mær, hvussu tað stendur til arbeiðsliga sæð úti á útjaðaraøkinum, tað er heilt vist. Takk fyri.

Anfinn Kallsberg (ff) viðmerking

Harra formaður.

Hatta var ein sera vánalig samanbering við jarðargrunnin. Jarðargrunnurin letur lán til allar Føroyar undir somu treytum, og orsøkin er, at vit hava miðsavnað allar íløgurnar inni á meginøkinum. Tað, sum grundin er fyri oyggjamenningargrunninum er tann, at hesin grunnur kann bert læna á útoyggjum, men tað, sum uppskotið hjá landsstýrinum gongur út upp á er, at tað eisini kann læna inni á meginøkinum undir somu treytum og ti verða allar íløgurnar framhaldandi miðsavnaðar inni á meginøkinum,

so einfalt er tað. Tað er tí, at eg vil framhaldandi siga, at oyggjamenningargrunnurin er einasti møguleiki fyri, at vit her á Føroya løgtingi kunnu siga, at so og so nógvur peningur av landsins fíggjarlóg og fíggjarorku kann brúkast til vinnuskapandi íløgur á útoyggjunum, so einfalt er tað.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Nú er tað soleiðis, at ein stórur partur av Føroyum er útjaðaraøki. Anfinn Kallsberg nevnir, at jarðargrunnurin lanir út eisini á meginøkinum, men tað, sum Anfinn Kallsberg gloymir í hesum her samanhangirum er, at fyri at hava eina framleiðslu, so skal tað verða ein rávøra og rávøran til tað, sum jarðargrunnurin lænir til, hon liggur í stóran mun á útjaðaraøkinum, og hvussu er tað vorðið. Har liggur alt í órøkt, og tann dag tað ikki loysur seg at sláa bøin úti í Mykinesi ella onkra aðra staðir ella norðuri á Viðareiði, so verður hann ikki sligin, tað er her, ið tað liggur. Tað nyttar einki at fáa lagalig lán og annað tílíkt, tað er hatta har, sum tað snýr seg um. Um tað er so ógvuliga gevandi hjá jarðargrunninum at lána til meginøkini, so kundu teir hjálpt til at lyft hini økini meir upp, men tá verður bara rokningin send til skattaborgaran fyri alt hetta her. Hatta har er fólkaflokspolitikkur í fullasta mát, soleiðis dríva teir politikk, rokningina út til skattaborgaran, tí skattaborgarin stendur við ábyrgdini alla somlu tíðina, tað er ongantíð tað, at teir sterku skulu hjálpa til at bera teir veiku í samfelagnum, og tað er tað, sum tað snýr seg um. Tað er tað, sum hasin har grunnurin gongur út uppá, oyggjamenningargrunnurin, tað er at frítaka teir sterku fyri at bera teir veiku og tað er fólkaflokspolitikkur.

Jógvan Sundstein (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Ja, tað er rætt at teir sterku skulu bera teir veiku, men tað rættara er, at gera tey veiku sterk.

Adolf V. Hansen (fr.)

Harra formaður.

Nú er tað soleiðis við hesum máli, at her er nógv papír við, og tað kemst av, at man hevur eina reglugerð, sum fylgjir við og hon fyllir nokk so nógv, men

tað er ikki so. Málið sjálvt er ikki so stórt, tað, sum talan er um, er faktiskt, at man kann lættari læna til útjaðaraøkini enn, hvat man kann til tey innaru økini. Størri er máli ikki enn sum so, at tað er tað, sum tað snýr seg um, antin vit skulu kunna verða meira lagaligir mótvegis útjaðaraøkínum enn, hvat vit eru í móti teimum sentralu økjunum, sum hava aðrar og betri møguleikar. Men nú havi eg hugt eitt sindur í hesa reglugerðina, tað er jú ikki hana, tað snýr seg um, tað er ein lítil lógarbroyting, hvar nøkur orð verða broytt í einari grein, men tá man hyggur í gjøgnum hetta her, so fari eg at heita á ta nevndina, sum fær hetta málið, tað er so vítt eg skilji ídnaðarnevndin, og eg vóni, at formaðurin í ídnaðarnevndini er til staðar.

Tað er eitt sindur av málmisbrúki, sum stendur í hesari her. Her stendur m.a., at dagliga umsitingin av grunninum liggur hjá stjóranum, umsiting er ikki nakað, sum liggur, hon kann verða har, hon er har, men hon liggur ikki har hjá stjóranum.

Eg haldi, at vit skulu fáa broytt í grein 5, tað kom Heini O. Heinesen eisini inn, har stendur, at fundarfrágreiðingirnar verða førdar í gerðabók. So stendur, ein minniluti kann krevja sína støðu tikna við í gerðabókina, hatta fari eg at biðja um at fáa strika, tí hatta er ein gylt regla, at tá ið ein gerðabók verður førd, so verður meiriluti og minniluti førdur í gerðabókina. So fari eg í gjøgnum formannin at heita á Heina O. Heinesen um at strika hatta pettið í grein 5, 1. stk., har tað stendur, ein meiriluti kann krevja sína støðu tikna við í gerðabókina, tí um so er, at vit byrja at lóggeva á hasum øki, so vil tað siga, at har tað ikki stendur, har kunnu teir ikki krevja tað. Men um teir bara gera einar 2-3 lógir av hesum slagnum, so vil tað siga, at ein minniluti kann ikki krevja tað, tí tað stendur í lógini, at hann kann ikki krevja tað. Tað skal ikki standa, tí hatta har er tann gylta reglan, at minnilutin kann krevja at fáa sína støðu førda inn í gerðabókina. Tí fari eg at heita á, at hatta pettið verður tikið burtur í bókini.

So hava vit í grein 8, 2 stk. Her stendur, nevndin hevur heimild til at søkja sær tekniskar og fíggjarligar upplýsingar hjá Búðskaparráðnum o.s.fr., tað má verða frá Búðskaparráðnum man søkir tað ikki hjá men frá. Soleiðis kundi tað verið farið

í gjøgnum allan vegin, eg skal ikki gera meir burtur úr hasum har annað enn, at eg skal heita á ídnaðarnevndina um kanska at fáa hetta kannað málsliga. Eg haldi, at tað er keðiligt at vit gera reglugerðir og lógir her á tingið, og at vit byrja eitt nýtt mál.

Eg vil enda við § 18, tað er tann seinasta greinin, har stendur, henda kunngerð fær gildi tann og so 1988, nær tað verður, tað seta teir so í, men ein kunngerð fær ikki gildi, líka so væl sum ein bussur ikki fær komið til Fuglafjarðar, men hann kemur til Fuglafjarðar.

Lógin og/ella reglugerðin hon er nakað berandi hon er nakað førandi, so tað er ikki nakað hon fær, hon gevur nakað til onnur, so har fari eg eisini at biðja gjøgnum formannin sjálvandi, formannin í ídnaðarnevndini um at fáa rættað hatta har orðið í § 18 soleiðis, at fær ikki kemur har, men kemur í gildi tann. Onkur nevndi tað í áðni, at har kundi møguliga havt staðið, har fær gildi frá tí og tí degnum, so var tað eitt sindur frægari.

Annars kann eg upplýsa, at eg ætli mær at taka undir við hesi her broytingini, sum eg meti er til ein fyrimun fyri útjaðaraøkini.

Vilhelm Johannesen(jv.) við-merking

Harra formaður.

Háttvirdi løgtingsmaður Aðolf V. Hansen var helst ikki komin inn í salin, tá eg byrjaði í áðni, og veit tí ikki tað sum eg segði í byrjanini, men uppskotið til kunngerð, tað skal samtykkjast av landsstýrinum og uppskotið til kunngerð er lagt við her sum fylgiskjal. Tað var fyri at kunna løgtingið um, hvørjar broytinar landsstýrið ætlar sær at gera kunngerðini, og vónandi kann landsstýrið fáa viðmerkingar frá løgtinginum. Eg vil mæla til, at tá ið ídnaðarnevndin fer at viðgera hetta uppskotið, so fer hon í álitinum at skriva, hvat hon vil mæla landsstýrinum til at broyta í uppskotinum til nýggja kunngerð soleiðis, at landsstýrið kann taka tað við í sínar metingar, tá ið kunngerðin skal viðgerast og samtykkjast.

Adolf Hansen tosaði næstan sum um, løgtingið skuldi samtykkja hesa kunngerðina, tað er nú ikki ætlanin, tað er eftir lógini landsstýrið, sum ger kunngerðina fyri Menningargrunnin og eisini samtykkir kunngerðina, men eg haldi, at tað er rætt, at ídnaðarnevndin skrivar nakað í álitið um, hvat ið

løgtingið meinar skal verða ørðvísi.

Adolf V. Hansen (fr.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er púra rætt, at eg ikki havi verið til staðar, tá ið Vilhelm Johannesen var her.

Tað er soleiðis, at eg eri so mikið ungur enn, at eg eigi skúlasøkjandi børn, og so er man noyddur at fara eftir teimum viðhvørt, tá ið man hevur konuna til at arbeiða fyri seg. So eg var burtur umleið eitt korter og í meðan hevur Vilhelm verið her uppi, men tað broytir ikki nakað sum helst upp á støðuna, henda her kunngerðin er løgd við til kunning, sum Vilhelm eisini segði, og júst tí eigur nevndin at broyta hana, tí fer hon haðani frá á henda hátt, hon er jú løgd við fyri at vísa á, hvussu ið kunngerðin skal verða, og tá kann landsstýrið ikki broyta hana soleiðis uttan nakað, tí vit taka lógarbroytingina undir fyritreyt, at henda kunngerðin verður við, og tí má tað verða loyvt teimum. Eg veit væl, at hon skal viðtakast endaliga av landsstýrinum, men eg vil siga tað upp á tann hátt, at iðnaðarnevndin skal kunna landsstýrið um, hvussu mán brúkar tað føroyska málið, um vit kunnu siga tað soleiðis.

Formaðurin

So eru tað ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað.

Eftir uppskotið verður málið beint í iðnaðarnevndina.

So verður fundurin niðurlagdur, og hann verður tikin upp aftur kl. 14°° í dag.

Formaðurin

So er fundurin uppafturtikin. Tað er komið eitt skriv frá aksturvinnufelagnum Samfylking og er soljóðandi: Vegna limir okkara, ið røkja hýruvognsvinnu í Tórshavnar kommunu, heitir felagið á Føroya løgting um at broyta tolllógina soleiðis, at hesir fáa vinnutól teirra undir somu treytir, sum líknandi vinnutól t.d. bussar.

Felagið vísir á, at hýruvognsreglugerðin er sett í gildi í Tórshavnar kommunu, og hevur kommunan valt eina trímannanevnd at umsita hesa.

Hetta skrivið verður beint í landsstýrið.

Síðani er komið eitt skriv frá Advokatfelagnum á Bryggjubakka, undirskriva av Jógvani Páll Lassen, til Føroya løgting og er tað soljóðandi: Undir orðaskiftinum um løgmansrøðuna 1988 skuldsetti Hilmar Kass, løgtingsmaður, Paula Ellefsen

fyri økonomiskan kriminalitet og ivaðist m.a. í, um Pauli Ellefsen hevði gingið leysur, um vit livdu í einum vanligum samfelagi:

Undirritaði vendir sær vegna Paula Ellefsen, løgtingsmann, til Hilmar Kass og vísir á, at hann var lopin fram av og kundi verða revsaður fyri brot á revsulógina § 268 og grein 267 fyri tað, sum sagt varð, men vildi samstundis geva honum høvi til at afturkalla hesar skuldsetingar og koma við eini umbering.

Hjálagt sendi eg makaskjala-váttan, dagfest 31. august 1988, har Hilmar Kass váttar, at verða lopin fram av og ikki ætlaði at skuldseta Paula Ellefsen fyri at hava tikið í móti mutri ella annan økonomiskan kriminalitet og biður um umbering fyri hesum.

Vísandí til, at skuldsetingarnar vóru settar fram í løgtinginum, fari eg at biða um, at hetta bræv saman við váttanini verður lisið upp í tinginum fyri, at tað, sum sagt varð undir løgmansrøðuni, fest á band og skrivað niður, ikki skal standa einsamalt. Biðið verður um, at hetta verður avgreitt beinanvegin, og verður sostatt ikki gjørt meira við hetta mál. Hjáløgd er so ein váttan, undirritað av Hilmari Kass og dagfest tann 31. august 1988, soljóðandi: Undirritaði Hilmar Kass, sum undir viðgerðini av løgmansrøðuni á Føroya Løgtingi 1988 m.a. nevndi borgarstjóra í Álborg og samstundis segði seg at ivast í, um Pauli Ellefsen hevði gingið leysur, um vit livdu í einum vanligum samfelagi. Vátti við hesum at verða lopin framav, tí tað var ikki ætlanin at skuldseta Paula Ellefsen fyri at hava tikið í móti mutri ella annan økonomiskan kriminalitet og biði um umbering fyri hesum.

So er hatta lisið upp.

Síðan skal eg lesa upp eitt annað bræv, sum er undirskrivað av Hans Trúgva Henriksen formanni í Føroya lærarafelag, tað er dagfest tann 23. august 1988.

Til Føroya Løgting. Føroya lærafelag kunnugt er uppskot lagt fyri løgtingið um at áleggja landsstýrinum at taka aftur avgerð tess at suspendera skúlastjóran í Vágs skúla. Hóast lærarafelagið hevur kært avgerð landsstýrisins til danskan kenslumálaráðharran, tí felagið heldur avgerðina um suspensión vera ólógliga, so metir felagið, at eingin orsøk er til, at løgtingið leggur seg út í málið.

Felagið hevur ta støðu, at trætan í Vágs skúla skal

loysast út frá galdandi reglum og um felagið hevur eitt hvørt at finnast at í málinum, skal hetta gerast tann veg, sum eigur at farast.

Viðmerkjast skal, at felagið heldur áðurnevnda uppskot vera sera óheppið, tí heimildin til at suspendera tænastumenn í føroyska fólkaskúlanum er givin danska konslumálaráðharranum eftir, at hesin fyrst hevur ráðført seg við Føroya landsstýri. Danska lóggávuvaldi hevur sostatt latið frá sær heimildina at suspendera tænastumenn í føroyska fólkaskúlanum til tveir útinnandi stovnar.

Um løgtingið kemur upp í málið, er annað og óviðkomandi lóggávuvald komið upp í myndina umframt, at lóggávuvaldið eigur at halda seg uttan fyri løgfrøðiligar trætur, tí til tess hevur felagið og borgarar annars dómsvaldið at fara til.

Føroya Lærarafelag fer tí at heita á háttvirda Føroya løgting um at vísa uppskotinum frá sær.

Hetta er undirskrivað av Hans Trúgva Henriksen formanni í Føroya lærarafelag.

Og so kemur til viðgerðar tingmál nr. 9, afturtøka av suspendering av skúlastjóranum í Vágs skúla.

Tos úti í salínum.

Formaðurin

So verður atkvøtt.

Tað er soleiðis, at § 11 í tingskipanini sigur soleiðis orðarætt:

Framløgd uppskot og broytingaruppskot kunnu eftir áheitan frá tingmanni verða víst burtur. Áheitanir verða settar fram, áðrenn umrøðan av uppskotinum er byrjað. Tingið ger tá av uttan umrøðu og um í minsta lagið 3/5 av tingmanningini greiða atkvøðu fyri, at uppskotið verður at vísa burtur. Tað vil siga tað, sum tað vanliga verður kallað, at tað krevst kvalíficeraður meiriluti fyri at vísa uppskotinum burtur.

Tos úti í salínum.

Tað er biðið um at lesa partar av brævinum upp aftur, í so fall fari eg at lesa alt brævið uppaftur soleiðis, at tingmenn fáa at vita fulla orðaljóðið.

Skriv frá Føroya lærarfelag, dagfest í Havn tann 23. august 1988 til Føroya Løgting.

Føroya lærarfelag kunnugt, er uppskot lagt fyri løgtingið um at áleggja landsstýrinum at taka aftur avgerða tess at suspendera skúlastjóran í Vágs skúla. Hóast lærarafelagið hevur kært avgerð landsstýrisins til danska kenslumálaráðharran, tí felagið heldur avgerðina um suspensión vera ólógliga, so

metir felagið, at eingin orsøk er til, at løgtingið leggur seg út í málið. Felagið hevur ta støðu, at trætan í Vágs skúla skal loysast út frá galdandi reglum, og um felagið hevur eitt hvørt at finnast at í málinum, skal hetta gerast tann veg, sum eigur at farast. Viðmerkjast skal, at felagið heldur áðurnevnda uppskot vera sera óheppið, tí heimildin at suspendera tænastumenn í føroyska fólkaskúlanum er givin danska kenslumálaráðharranum eftir, at hesin fyrst hevur ráðført seg við Føroya landsstýri.

Danska løggávuvaldið hevur sostatt latið frá sær heimildina at suspendera tænastumenn í føroyska fólkaskúlanum til tveir ótinnandi stovnar.

Um løgtingið kemur upp í málið, er arnað og óviðkomandi løggávuvald komið upp í myndina umframt, at løggávuvaldið eigur at halda seg uttanfyri løgfrøðiligar trætur, tí til tess hevur felagið og borgarar annars dómsvaldið at fara til.

Føroya lærarafelag fer tí at heita á háttvirda Føroya løgting um at vísa uppskotinum frá sær. Skrivið er undirskrivað av Hans Trúgva Henriksen, formanni í Føroya Lærarafelag.

Áðrenn vit fara til atkvøðugreiðsluna í hasum málinum, so taka vit nakrar framløgur inn í millum.

Tað er Anfinn Kallsberg, sum fær orðið til framløgu av tingmáli nr. 45, løgtingslóg um dupultsporað berghol millum Ánirnar, Árnafjørð og Depil.

<u>Anfinn Kallsberg</u> (ff.)

Harra formaður.

Fyri hálvum øðrum ári síðan legði Fólkaflokkurin fram uppskot um dupultsporað berghol eystur um fjall á Borðoynni, tingmál nr. 96 frá 1986. Í viðmerkingunum til tað málið vístu vit á, at ferðslan er ógvuliga nógv økt, og at akførini eru vorðin størri hesi 20 árini, síðani núverandi berghol vórðu tikin í nýtslu. Vit hildu, at tíðin nú var komin at fyrireika nýggj berghol, tí vit halda ongar møguleikar vera fyri at víðka verandi berghol uttan at steðga ferðsluni heilt, og tað kann als ikki koma upp á tal.

Vit vistu, at tað ganga nøkur ár frá tí, at fyrireikingarnar byrja, til tey nýggju bergholini verða klár at taka í nýtslu, og høvdu vit tí uppskot um, hvussu tann ruðuleikin kundi loysast, sum hvønn dag er inni í bergholinum, tá ið stórir bilar møtast, ið ikki kunnu halda sína víkiskyldu. Hetta var eitt uppskot um ljósregulering, men okkara uppskot vórðu feld. Í staðin var eitt uppskot til

samtyktar frá meirilutanum í samferðslunevndini samtykt, sum álegði landsverkfrøðinginum at gera tørvskanningar og at útvega uppskot um, hvussu truplu ferðsluviðurskiftini í berholinum kundu loysast. Síðan hoyra vit einki aftur til málið fyrr enn í juni mánað í ár, tá farið verður undir at víðka møtiplássini inní í eystara bergholinum.

Fyri tað fyrsta halda vit ikki, at hetta arbeiðið, tá tað er liðugt, loysir trupulleikarnar, men arbeiðið inni í bergholinum hevur hinvegin ført við sær, at bergholini eru vorðin ein deyðsfella. Rennurnar, sum skulu halda vatni av koyribreytini, eru typtar av sprongdum grótí, so alt eystara berghol er teir beru hyljar.

Arbeitt verður í millum kl. 23°° og 06°° men kl.06°° á morgni er ofta so tjúkt av sprongigassi og maskinosa inni í bergholinum, at tað als ikki er framkomandi. Hetta gassið kann í stillum veðri verða standandi allan dagin. Sum oftast er uppruddingin av koyribreytini ikki liðug fyrr enn út í móti miðdegi, og har sprongt er, er eingin trygging gjørd av loftinum. Hyljarnir eru so stórir, at fleiri bilar eru kødnaðir av vatni og har staði uppsteðgaðir í øllum hurlivasanum.

Úrslitið av hesum er, at tað eru sera nógv fólk, sum dagliga skulu brúka hesa farleið til og frá arbeiði, sum ikki tora at koyra í gjøgnum bergholini. Eisini liggur økið eystan Múla avskorið frá lækna og hjálparveiting frá Klaksvík, um so skuldi borið á, at brúk var fyri hesum, meðan arbeitt verður í bergholinum.

Í uppskot okkara nr. 96 frá 1986 vístu vit á, hvussu sleppast kann undan, at tvey stór akfør, sum ikki kunnu halda sína víkjuskyldu, møtast inni í bergholinum. Vit fara ti at loyva okkum eina ferð enn, at seta hetta uppskot fram, og samstundis at steðga ti arbeiði, sum er í gongd har beinanvegin.

Við formansíns loyvi, eitt uppskot til samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at steðga arbeiðnum við at víðka víkiplássini í Borðoyar bergholinum og at fáa tey aftur í tann stand, tey vóru í frananundan og at skipa fyri ljósregulering fyri akfør, sum ikki kunnu halda sína víkiskyldu.

Harafturt er eitt lógaruppskot, við formansins loyvi.

Løgtingslóg um dupultsporað berghol millum Ánirnar, Árnafjørð og Depil.

§ 1. landsstýrinum verður heimilað at skipa fyri gerð av dupultsporaðum bergholum í, millum Ánirnar, Árnafjørð og

Depil.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

Og við hesum er málið framlagt.

Formaðurin

So fær Óli Breckmann orðið til uppskot nr. 38: Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti.

Tað er Óli Breckmann ella vegna hann Svend Aage Ellefsen, sum fær orðið til framløgu av tingmáli nr. 37 í staðin fyri. Uppskot til samtyktar um stovnseting av blaðmannaútbúgving í Føroyum.

Svend Aage Ellefsen (ff)

Harra formaður,

Vegna uppskotstillaran Óla Breckmann skal eg leggja fram uppskot til samtyktar um stovnseting av blaðmannaútbúgving í Føroyum.

Nú skúlaverkið er so væl útbygt her á landi mátti borið til hjá føroyingum, sum ynskja at læra blaðmannayrkið, at fingið minst ein part av hesi útbúgving her á landi. Ein partur av blaðmannaútbúgvingini eigur tó enn at nemast uttanlands lutvíst, tí vit enn ikki eru før fyri at bjóða fullfiggjaða útbygging av hesum slag, men eisini lutvíst tí blaðfólk í læru hava gleði og gagn av at nema part av lærun í einum av grannalondum okkara.

Blaðmannaútbúgvingin hevði komið føroysku týðindatænastuni og fjølmiðlum okkara til góða og upplýsingar støðið hevði hækka. Men eisini eigur løgtingið at hava í huga, at alsamt fleiri fyritøkur, felagsskapir, virkir og stovnar kundu hugsað sær at havt fyri neyðini at venda sær til við tíðindum og marknaðarføring til viðskiftafólk í Føroyum og uttanlands. Størri tal av blaðfólki til taks hevði styrkt marknaðarføringina hjá føroyskum vinnulívi.

Eg skal leggja uppskot til samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri, at sett verður á stovn blaðmannaútbúgving í Føroyum

Við hesum er málið framlagt.

Formaðurin

Og so er tað aftur eitt uppskot frá Óla Breckmann um uppskot til samtyktar um hálvt útvarps og sjónvarpsgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving. Tað er tingmál nr. 33.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Harra formaður.

Vegna Óla Breckmann skal eg leggja fram tingmál nr. 33. Uppskot til samtyktar um hálvt útvarps og sjónvarpsgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving.

Striltið er ofta hjá fólki við niðursettari inntøku og serliga ungfólki í útbúgving og fólkapensionistum at fáa endarnar at røkka saman, tá allar fíggjarligar skyldur eru røktar. Serliga eldri fólk stytta sær stundir og hjálpa sær úr einseminum við at lurta eftir útvarpinum og hyggja at sjónvarpi. Men at gjalda eina hálva mánaðarpensión í útvarps og sjónvarpsgjaldi er meir enn hitt almenna, sum hevur ábyrd av hesum báðum tíðindamonupolunum, kann verða kent at krevja inn frá lægsta og veikasta inntøkubólkinum. Ungfólk í útbúgving eru í somu inntøkuveiku støðu, tí tey ofta liva uttan lønt arbeiði.

Tí verður skotið upp fyri løgtinginum, at útvarps og sjónvarpsgjaldið hjá pensionistum og ungfólki í útbúgving verða lækka niður í helvtargjald.

Við formansins loyvi skal eg lesa upp uppskot til samtyktar. Løgtingið samtykkur, at pensionistar og fólk undir útbúgving bert skulu rinda hálvt útvarps og sjónvarpsgjald.

Formaðurin

Síðani fær Svend Aage Ellefsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 36: Uppskot um dagføring av hagtølum.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Harra formaður.

Vegna Óla Breckmann, løgtingsmann skal eg leggja fram løgtingsmál nr. 36, uppskot um dagføring av hagtølum. Í landsstýrisins og ríkisumboðsins ársfrágreiðing sæst, at eingi feskari hagtøl eru yvir bítið ímillum vinnubólkarnar enn ári 1977. Hesi hagtøl eru nú so ótíðarhóskandi, at tað ikki longur er gjørligt hjá politikarum ella almenningi at hava nakra hóming av, hvussu menningin hevur verið í vinnubýtinum í hesum samfelag. Sama er galdandi fyri bústaðarhagtøl hóast 3.500 sethús eru bygd síðan 1977, tað er ein fjórðingur av øllum sethúsum í landinum.

Landsstýrisins hagdeild er væl mannað við serfrøðingum, og tí ná tað verða eitt rímiligt krav til landsins fyrisíting, hvørs rakstrarkostnaður er tvífaldaður hetta valskeiðið, at

løgtingsmenn og onnur, sum hava hesi vinnuligu býtishagtøl og búðstaðarhagtøl fyri neyðini, kunnu fáa tey upplýst. At kenna dagførda býtið millum vinnuligu og almennu bólkarnar frá ári til árs, er grundleggjandi krav til eitt toluliga framkomið samfelag.

Við formansins loyvi skal eg lesa upp uppskot til samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt at syrgja fyri dagføring av hagtølum yvir atvinnu og atstøðu Føroya fólks.

Við hesum er málið framlagt.

Formaðurin

So fær Svenð Aage Ellefsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 30. Avtøka av avgjaldi av blýfríum bensini.

Svenð Aage Ellefsen (ff.)

Harra formaður.

Vegna Óla Breckmann, løgtingsmann, skal eg leggja fram løgtingsmál nr. 30: Avtøka av avgjaldi av blýfríum bensini. Í fleiri londum er tað eitt lógarkrav í sambandi við umhvørvisverju, at bilar hava katalisatorar ið eru ætlaðir til blýfrítt bensin. Í stuttum merkir hetta, at fyri tað fyrsta er blýfría bensinið sera lítið dálkandi, og við nýtslu av katalisatori er talan at kalla ongin dálking frá bilunum.

Stórir býir á amerikanska og partvís europeiska meginlandinum hava ómetaliga góðar royndir við nýtslu av blýfríum bensini og katalisatorum á bilum, men trupulleikin er, at talan er um stórar íløgur hjá oljufeløgunum, um tey skulu liggja á goymslu við og selja hetta bensinið. Kortini kann blýfrítt bensin nú keypast í øllum grannalondum okkara, tí myndugleikarnir hava heilt einfalt avtikið avgjald á blýfríum bensini. Í flestu førum er blífría bensini enn tá bíligari, enn vanliga bensinið, til tess á tann hátt at fáa flestu fólk at nýta tað, og harvið verja umhvørvið sum best.

Sum frá líður koma fleiri og fleiri bilar til landið við katalisatorum, og eru teir tí ætlaðir til blýfrítt bensin. Sum er, verður katalisatorurin og tann útgerð, sum har til hoyrir avmonterað í Føroyum, tí hon ferst av blýbensininum.

Oljufeløgini hava alment tosa um íløgur upp á omanfyri 50 mió.kr., um tey skulu selja blýfrítt bensin á jøvnum føti við vanligt bensin. Harvið verður blýfritt bensin fleiri kr. dýrari fyri liturin, minst hálva ferð dýrari. Einasti møguleiki er tí at kompensera meirkostnaðin við at lækka

avgjaldi á bensini ella heilt at taka tað av til tess at fáa prísin á blýfría bensininum niður á sama støði, sum á vanliga benzininum helst longur niður.

Við formansins loyvi skal eg lesa upp uppskot til samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum, at avtaka serliga avgjaldið á blýfríum bensíni.

Við hesum er máli framlagt.

Formaðurin

So fær Svend Aage Ellefsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 44 viðvíkjandi rúsdrekkalógini um skamtan av skipanini.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Harra formaður.

Vegna Óla Breckmann, løgtingsmann, skal eg leggja fram løgtingsmál nr. 44: Viðvíkjandi rúsdrekkalóginí og skamtanarskipanini.

Tað hevur leingi ljóðað og er nýliga prógvað, at tað ber til at fáa skattaváttan og skamtanarkort til rúsdrekka uttan at skula leggja fram legimetatión ella fullgylduga fulltrú. Tað sigst av royndum at verða gjørligt hjá ungdómi niður til 13 ára aldur, tá tey verða skrásett sum A skatt gjaldarar, at innloysa øl upp til gull styrki. Møguleiki er somuleiðis til staðar við misnýtslu av gestakortum. Endamálið við galdandi rúsdrekkalóg, antin hon so verður hildin heppin ella ikki, er júst at fyribyrgja, at komandi er til rúsløg hjá hálvvaksnum og stórum smábørnum í óavmarkaðum nøgdum. Ovurnýtsla av rúsdrekka millum ungfólk er menniskjasligt og samfelagsligt vandamál, sum Føroya løgting hevur ábyrgd av at steðga í tann mun, tað er gjørligt.

Við formansins loyvi skal eg lesa upp uppskot til samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt antin við lógaruppskoti ella í samstarvi við løgregluna at tryggja, at galdandi rúsdrekkalóg harvið reglugerð um galdandi skamtanarskipan verða fylgdar.

Hervið er málið framlagt.

Formaðurin

So fær Svend Aage Ellefsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 32,: Skattafrádráttur fyri leiguútreiðslur til býli.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Vegna Óla Breckmann, løgtingsmann, skal eg leggja fram løgtingsmál nr. 32: Skattafrádráttur fyri leiguútreiðslur til

býli.

Um 85% av føroyingunum búgva heima hjá sær sjálvum, og er sjálveigaraskipanin av egnum býli ein búðstaðarháttur, vit mugu halda fast um. Men ikki skerst burtur, at part av lívinum búgva fólk ofta nýgift við smáum børnum til leigu, meðan tey baksast við at seta føtur undir egið borð. Tungt er fíggjarliga at fáa tak yvir høvdið serliga, um húsleigan leggur hald á fittan part av inntøkuni hjá ungum familjum. Tí verður skotið upp at leggja inn í skattalógina serligan frádrátt t.d. 10.000 kr. árliga soleiðis, at tað verður lættari hjá nýstovnaðum familjum við smáum børnum at spara upp til egin hús. Hóast uppskotna upphæddin kann tykjast heldur lág, stendur tinginum frítt at áseta hægri frádrátt. Tó eigur at havast í huga, at tað altíð má verða fyrimunur hjá fólki at búgva undir egnari lon, og at sjálveigaraskipanin verður tryggjað best við ikki at gera leigufrádráttin so høgan, at tað er lættari at búgva til leigu enn inni hjá sær sjálvum. Við formansins loyvi skal eg lesa upp uppskot til samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum at føra inn í skattalógina serligan frádrátt fyri leigaútreiðslur av býli 10.000 kr. árliga.

Hervið er málið framlagt.

Formaðurin

So fær Svend Aage Ellefsen orðið til framløgu av løgtingsmáli nr. 35, rentuágóðin av innistandandi frítíðarpeningi til løntakarar.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Vegna Óla Breckmann, løgtingsmann, skal eg loyva mær at leggja fram, uppskot til samtyktar. Løgtingsmál nr. 35: Rentuágóðin av innistandandi fríðtíðarpeningi til løntakarar.

Føroyski løntakarin er fyri inntøkumissi hvørt ár, tí tann frítíðarpeningur, løntakarin eftir lógini eigur til góðar sum procentpartur av lønini, kemur fagfeløgunum og ikki løntakaranum persónliga til góða. Hetta eigur at verða broytt soleiðis, at hin einstaki fær fullan fyrimun av rentuni av ti frítíðarpeningi, hann sjálvur og ikki yrkisfeløgini fáa sambært lóg um fríðtíðarløn. Har løntakarin ikki stendur í yrkisfelag, fellur rentutilskrivingin til frítíðargrunnin hjá Líkningarráðnum, tað er ein inntøka hjá landskassanum. Løntakarin persónliga eigur

sjálvandi eisini rætt til henda rentuágóða.

Við formansins loyvi skal eg lesa upp uppskot til samtyktar. Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið, uppskot um broyting í løgtingslóg um fritíðarløn soleiðis, at tað frameftir verður løntakarin persónliga, og ikki sum nú fagfeløgini, sum fáa ágóðan av rentutilskriving av innistandandi fríðtíðarløn.

Við hesum er málið framlagt.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Eg skal vegna Óla Breckmann, løgtingsmann, leggja uppskot til samtyktar. Løgtingsmál nr 28/ 1988. Uppskot til samtyktar um hækking av persónsfrádráttinum. Fjøldin av føroyingum vildu fegin stuðlað einum ella fleiri av teimum nógvu feløgum, sum eru stovnað við einum hjálpandi ella heilsubøtandi endamáli, men limaskapur í hesum feløgum kostar ofta meira, serliga tá talan verður um fleiri limagjøld, enn fólk við vanligum inntøkum hava ráð til.

Um persónsfrádrátturin í skattinum verður hækkaður við 1.000 kr., hevði henda upphædd, spard í skattalokningini, rokkið til eini 10 limagjøld árliga, og ósjálvsøkna vælgerðararbeiðið hjá hesum feløgum hevði fingið stórt gagn av hesum uppskoti.

Ráðiligt er tó, at landsstýrið skrásetir feløg, ið kunnu verða viðurkend eftir komandi lóg, og at líkningarvaldið fær prógv fyri, at frádrigni peningurin veruliga er farin til endamálið. Løgtingið áleggur landsstýrinum at broyta skattalóggávuna soleiðis, at persónsfrádrátturin verður hækkaður við kr. 1.000 kr. undir teirri treyt, at skattgjaldarin nýtir henda pening til vælgerandi endamál.

Formaðurin

So fær Óli Breckmann orðið til framløgu av tingmáli nr. 27/1988. Uppskot til samtyktar um lækking av skattatrýsti.

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Føroyski búskapurin, útflutningsvinnan og framleiðsluvinnan til heimamarknaðin hava við verandi føroyska lønarlagnum ongan livandi kjans at klára seg í kapping við útlendska framleiðslu. Rakstrar- og framleiðslukostnaðurin í Føroyum er hækkaður ovurhonds nógv farna valskeið, serliga eftir 10% avgjalds og tiskil lønarhækking í fyrra ári og í

fjør, framhaldandi herðing av skatta- og avgjaldstrýstinum við harav hækkandi lønarkrøvum til vinnulívið, sum síðan hækkar kostnaðarstøðið enntá úti í búskaparligum óføri. Um landsstýrissamgongan tekur hetta uppskot til eftirtektar og vendir sær til partarnar á arbeiðsmarknaðinum um lønarbata, vil linking í skattatrýstinum verður tvífaldur vinningur av hesum. Í fyrra lagi fast realløn arbati uttan lønarvøkstur, og í øðrum lagi verður almenna nýtslan tálmað av lægri inntøku í landskassan. Á henda hátt fær føroyski almenningurin ein part av tí peningi aftur, sum landskassin hevur lagt hald á hetta farna valskeiðið.

Uppskotið við formansins loyvi til samtyktar er soljóðandi:

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við arbeiðsmarknaðin, sum miða í móti at steðga lønarvøkstrinum við at lækka skattatrýstið tilsvarandi.

Formaðurin

So verður farið undir atkvøðugreiðsluna, av tingmálið nr. 9 ið skuldi verða við navnakalli. Ja, so verður farið undir atkvøðugreiðsluna við navnakalli um eftir uppskoti sambært grein 11, í tingskipanini at vísa aftur tingmáli nr. 9: Afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla. Eg má vísa tí málinum burtur.

Eg skal lesa upp grein 11, sum sigur soleiðis: Framløgd uppskot og broytingaruppskot kunnu eftir áheitan frá tingmanni verða víst burtur. Áheitanin verður at seta fram, áðrenn umrøðan av uppskotinum er byrjað, og tann áheitanin er komin viðvíkjandi hesum máli. So lesi eg viðari. Tingið ger tá av, uttan umrøðu, og um í minsta lagi 3/5 av tingmanningini greiða atkvøðu fyri, at uppskotið verður at vísa burtur.

(atkvøðugreiðsla)

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni var, at 18 atkvøður vóru ja og 3 nei, 8 atkvøddu ikki og 3 burturstaddir, og tað merkir so tað, at málið kemur til viðgerar eftir tingskipanini og vit fara undur fyrstu viðgerð av tingmáli nr. 9: Afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Eg fari at nýta høvi til at takka tinginum fyri, at teir ikki vistu hesum máli frá sær. Rætt er tað, at slík mál sum hetta, ið viðgera viðurskifti á einstøkum stovnum, har nógvir persónar eru

uppi í, kunnu verða óheppin at hava til viðgerðar her í tinginum, og rætt er tað, og hetti ásanni eg eisini, sum uppskotstillari í viðmerkingunum til uppskotið, har sagt verður við formansins loyvi. Óneyðugt skuldi verið at komið í tingið við uppskoti sum hesum, men tá hugsa verður um, hvussu leikur er farin fram í hesum máli, so verður hetta gjørt í vónini um, at meiriluti fæst her á tingi fyri at fáa í rættlag avgerð, sum frá løgfrøðiligum sjónarmiði verður søgd at verða einum rættarsamfelagi óverdug. Tað er eingin loyna, at tað er mítt ynski og mín vón, at hetta mál vinnur frama her á tingi, og tað ger tað bara við, at Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og eg sjálvur og so Sjálvstýrisflokkurin og kanska Adolf Hansen eisini tekur undir við málinum, livst so spyrst, hvussu tann atkvøðugreiðslan fer at avtornað.

Men harra formaður, eg loyvi mær beinavegin at gera eina viðmerking til sjálvt uppskotið, sum eg biði formannin taka til eftirtektar í orginalinum, og at tingmenn kunnu skoyta uppí. Uppskot til samtyktar, skal verða soljóðandi:

Álagt verður landsstýrinum alt fyri eitt at taka aftur suspenderingina av skúlastjóranum við Vágs skúla. Sum ískoyti afturat hasum. Bíða eftir úrslitinum av tænastumannakanningini. Tað, sum skuldi rættast, var hetta ískoytið, og bíða eftir úrslitinum av tænastumannakanningini.

Harra formaður. Nú veit eg ikki beinanvegin her og nú, hvat ið skal leggjast til brots við her eg fari at síggja, hvussu orðaskiftið fer at fara fram. Nú varð eitt skriv upplisið frá lærarfelagnum, har lærarafelagið heitir á løgtingið um ikki at viðgera málið, og í hesum verður sagt, at viðmerkjast skal, at felagið heldur áðurnevnda uppskot vera sera óheppið, tí heimildin at suspendera tænastumenn í føroyska fólkaskúlanum er givin ćanska kenslumálaráðharranum, eftir at hesin fyrst hevur ráðført seg við Føroya landsstýri. Her reisur fyrsti spurningurin seg.

Mær vitandi hevur landsstýrið suspenderað skúlastjóran við Vágs skúla, ikki í tráð við tað, sum fyriliggur í hesum skrivi frá lærarafelagnum. Mær vitandi er kenslumálaráðið ikki inndrigið og eftirspurt frá landsstýrisins síðu í hesum máli, ið hvussu so er ikki tann dag tá ið suspenderingin varð tikin. Hvat síðan kanska er farið fram í millum landsstýrið og kenslumálaráðið, tað dugi eg also ikki at siga.

So verður sagt víðari, at danska lóggávuvaldið hevur sostatt latið frá sær heimildina at suspendera tænastumenn í føroyska fólkaskúlanum til tveir útinnandi stovnar, og har rokni eg við, tað, sum meint verður, er til landsstýrið og til kenslumálaráðið, soleiðis skilji eg tað.

So verður sagt víðari í hesum skrivi, um løgtingið kemur upp í, er annað og óviðkomandi lóggávuvald komið upp í myndina umframt, at lóggávuvaldið eigur at halda seg uttan fyri løgfrøðiligar trætur, tí til tess hevur felagið og borgarar annars dómsvaldið at fara til. Eg skilji ikki rættiliga logikkin í hesum skrivi, tí sum kunnugt, so situr landsstýrið og útinnur, meðan løgtingið lóggevur og lat tað verða púra greitt sagt her, sum so mangan áður tikið upp á tunguna, at tað er eingin yvir løgtinginum, landsstýrið er ikki yvir løgtinginum, og tí kann eg ikki hava samljóð frá mínari síðu til hetta skriv, tí hevur landsstýrið fyritikið sær nakað, sum er í strið eitt nú við galdandi lóg ella galdandi praksis. Fyrí tað næsta hevur landsstýrið tikið eina avgerð, sum eftir mínum tykki er ein beistagerð og botnar í politiskum hurlivasi og politiskum trýsti, so er tað tað lóggevandi valdið, sum skal grípa inn og fáa steðgað hesum.

Harra formaður. Eg ynski ikki og vónandi fer heldur eingin annar út í detaljur, hvat einstøkum persónum viðvíkjur í hesum máli, men tað er meira tað princippiella í hesum, at rættartrygdin í einum samfelag nevnliga við hesi avgerð landsstýrisins hevur verið hótt.

Tað var ein maður, sum einaferð segði nakað soljóðandi, hann kom av talarapallinum á ST høvuðsskrivstovuni aftan á at hava verið knúskaður, hann segði:"Í dag vit og í morgin tit". Tí er tað upp á tíðina, og tí er tað ynski mítt, at løgtingið dyggiliga setur landsstýrið upp á pláss júst í hesum máli. Var tað, sum fyriliggur í dag, lagt fram á henda hátt at talan var um eina kanning av teimum 13 plus tí eina og landsstýrið kom til ta niðurstøðu, at nú bíða vit ikki longur, men at ein suspendering fer fram av øllum so kanska, at fólk kundu skilt logikkin í tí, sum farið er fram, men tað, sum landsstýrið hevur gjørt her skal undurstrikast, at landsstýrið pilkar tann eina persónin burtur úr mongdini og suspenderar hann.

Harra formaður. Lærarafelagið hevur verið nevnt í hesum sambandi og í Tingakrossi 19.

august 1988, verður sagt á forsíðuni eisini ein endurgeving frá lærarafelagnum við yvirskrift: Lærarafelagið mótmalir suspendering. Har verður sagt frá formanninum í lærarafelagnum, at formaðurin í lærarafelagnum vil verða við, at landsstýrið, í samband við gøluni um Vágs skúla hevur latið seg manipulerað av ávísum bólkum.
(Formaðurin vísir á, at tað krevst loyvi til at endurgeva).
Hetta varð so endurgivið úr Tingakrossi og tað, sum har stendur, er helst soleiðis, at tað botnar í bandupptøku.

Tað er rætt, at tað hevur verið ófriður við henda skúla hesi árini, tað er eingin loyna, og tað var eisini, havi eg skilt, grundin til at kanningin á sinni varð sett í verk. Hóast landsskúlaráðið, sum landsskúlaráð ikki nælti til hesa, so tók landsstýrið avgerðina um, at kanningin skuldi setast í verk. So hendi tað, at tíðin gongur og nú kanska stutt áðrenn, at úrslitið av hesi tænastumannakanning fyriliggur tekur landsstýrið hesa ógvusligu avgerð, hóast sum eisini framgongur aðrastaðir, at skúlaviðurskiftini hava verið í lagi hesa tíð, meðan kanningin er farin fram.

Harra formaður. Vit vita, at tað hava verið ávísir bólkar, sum hava strongt á fyri at fáa avvarðandi skúlastjóra frá. Men vit vita eisini, at tað hevur verið eitt annað felag har suðuri, foreldrafelagið Trivni, sum eisini hevur gjørt vart við seg. Her fari eg at loyva mær at lesa tað brævið upp, sum var sett øllum ting- og landsstýrismonnum á sinni, við formansins loyvi. Dagfest 16. juni 1988.
Sum øllum føroyskum politikarum kunnugt er skúlaósemjan í Vági vorðin politisk kastibløka hjá ávísum flokkum og enntá fólkatingsvalkvøldið nýtt sum orsøk til atkvøðuafturgongd hjá ávísum flokki. Vit í foreldrafelagnum Trivni í Vági, sum umboða 400 limir fara at átala, at m.a. børn okkara verða útsett fyri slíkum óumhugsaðum politiskum ágangi. Felagið krevur, at tann kanning, sum er sett í verk skúlaviðurskiftunum í Vági viðvíkjandi verður fullførd nú, hon er komin so langt og at úrslitið av henni fær eina ópolitiska viðgerð, tá tað fyriliggur. Vit heita tí inniliga á tykkum politikarar, sum taka starv tykkara í álvara og við ábyrgdarkenslu, um ikki at lata børn okkara svíða fyri tað, sum vónbrotnir politikarar gera í sinnisrørðslu, men at tit átala slíkt og leggja trýst á slíkar ábyrgdarleysar persónar.

Við vón um at í hesum landi

framvegis ræður demokrati, har rættindi borgaranna eru vard móti ágangi, senda vit hesa áheitan til tykkara, citat slutt.

Harra formaður. Hetta var skrivið, sum foreldrafelagið Trivni sendi landsstýrinum og løgtingsmonnum á sinni, og lat meg beinanvegin undirstrika her frá talarastólinum, endamálið við hesum uppskoti er ikki at taka dagar í millum nakran, sum hevur við sjálva ósemjuna har suðuri at gera, men bara hetta átala og áheitan á løgtingið um at áleggja landsstýrinum at taka suspenderingina av tí eina persónínum aftur og bíða eftir, hvat kanningin sigur. Lat okkum bíða eftir, hvat kanningin sigur, og lat kanningina so verða grundarlagið til tær avleiðingar, tað verði seg fyri skúlastjóran ella aðrar, sum eru involveraðir í hesi viðurskiftir. Tað er har knúturin er, og tað er hatta, sum er alt avgerandi í hesum máli.

Harra formaður. Eg skal ikki siga meira á hesum sinni. Takk.

Løgmaður

Harra formaður.

Eg skal ikki taka lut í orðaskiftinum her. Eg kann ikki sum undanfarni røðari loyva mær framman undan at taka dagar ímillum. Tá ið hann sigur, at hann tekur ikki dagar ímillum, so mótsigur hann sær sjálvum, tað er júst tað, hann hevur skrivað í uppskotinum, hann tekur dagar ímillum. Men eg skal bara rætta nakrar skeivleikar, sum tykjast vera runt um í samfelagnum. Málið hoyrir ikki heima á tingi í eini tingviðgerð, tað eru reglur at ganga eftir í hesum máli, sum við so nógvum øðrum, men eg skal rætta nakrar skeivleikar.

Tað verður sagt, at landsstýri hevur ikki heimild til at suspendera og tað kemst helst av eini samanblanding av orðinum suspensión og at loysa úr starvi uttan umbøn, tað er hvør sítt. Myndugleikin til at suspendera liggur sum tað stendur í lógini hjá sentralmyndigheden í hesum føri teimum føroysku skúlamynduleikunum og landsstýrinum. Verður úrslitið at landsstýrið innstillar til at loysa skúlastjóran úr starvi uttan umbøn, so er tað rætt, at enn liggur tann myndugleikin hjá undirvisingarmálaráðharranum. Harnæst skal eg eisini rætta ein annan skeivleika, sum eisini hevur verið í fjølmiðlunum undir viðgerðini av hesum máli og tað er, at landsstýrisinsavgerð er framd við 2 atkvøðum, tað passar ikki, hon er framd

við fullum meiriluta á landsstýrisfundi, hvar ið allir 6 landsstýrislimir vóru til staðar. Síðan verður sagt, at tað er beint áðrenn, at tænastumannakanningin er liðug, har er bara tíverri at konstatera, at tað hevur tað alla tíðina verið.

Landsstýrið hevur roynt at fáa ábending um, nær henda tænastumannakanning kundi verða liðug, um hon kundi verða liðug 10. august t.d., men kundi onga trygd fáa fyri hesum, tí at hon varð ikki liðug fyrr enn móti endanum av august. Men sum kunnugt, so er endin av august farin, vit eru komin í september, so landsstýrisins meting um, at hon ikki fór at fyriliggja, áðrenn skúlaárið byrjaði og at man tí framhaldandi fór at hava ótrygg viðurskiftir har, vísti seg at vera bein. Tað er tann einasta orsøkin, tað er fyrilitið við skúlanum og virksemi hansara, sum hevur motivera hetta og ikki tað, sum lærarafelagið heingir seg í, at man vil leggja trýst á kanningarleiðaran. Harvið letur bakaran bera straffin fyri smiðin, tað havi eg einki í móti at taka aftur ella prestera yvir fyri løgtinginum og samstundin yvir fyri Føroya lærarafelag, at tað er ikki tað, sum er orsøkin. Man kundi vóna, at tað fór at framskundað hesa kanningina, men tað er einki, sum týður uppá, at tað er farin nøkur framskunding fram. Man hevur bíðað og bíðað alla hesa tíð, og tað er ósatt, at landsstýrið hevur blandað seg upp í og lagt trýst á kanningarleiðaran, tvørtur í móti, man hevur spurt, nær hetta var liðugt og man hevur fingið í hópatali av døgum uppgivnar, nær tað verður liðugt og hvørja einastu ferð bíða eftir hesum degi. Skal eg siga nakað politiskt um hetta, tað kann eg loyva mær at gera uttan at, sum tað eitur við einum fínum orði "prejudesera" mína støðu í hesum málinum, tí hana havi eg ikki loyvi til at taka, fyrr enn úrslítið fyriliggur. So skal tað verða tað, at einasta uppílegging politiskt, hon er komin frá uppskotsstillarunum, sum í síni "skinhelligheit" hevur misnýtt hetta málið sum so mong onnur mál. Men livst so spyrst.

<u>Eilif Samuelsen</u> (sb.)

Harra formaður.

Vegna Sambandsflokkin vil eg siga frá, at flokkurin ynskir ikki at taka orðið í hesum máli.

Jógvan Sundstein (ff.)

Harra formaður.

Tað er komið eitt uppskot, lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum viðvíkjandi suspensiónini av skúlastjóranum við Vágs skúla.

Tað, sum fyrst er komið fram í tinginum í samband við hetta mál, er, at ein partur av tinginum ynksti at málið varð afturvíst út frá tí sjónarmiði, at hetta mál ikki hoyrdi heima til viðgerðar á Føroya løgtingi. Tað er sjálvandi ringt at avgera, hvørji mál hoyra heima á tingi og hvørji, ið ikki hoyra heima. Men vit eiga fyrst, at gera okkum greitt, at ein og hvør tingmaður eins og landsstýrið hevur rætt at leggja mál fram á ting. Tí er tingskipanin eisini soleiðis innrættað, at um eitt mál skal verða afturvíst, so skal tað verða kvalificeraður meiriluti fyri, at afturvísa mál, og tað var tað so ikki í hesum føri.

Vit koma av og á út fyri, at mál snúgva seg um persónar, ja, tað er ofta soleiðis, at vit koma út fyri tí, í flestu førum er tað um nógvar persónar, í flestu førum er tað um samfelagið sum heild, tað eru eisini persónar, í øðrum førum eru tað færri persónar og í einstøkum førum er tað bara einstakar persónar, sum málið snýr seg um. Men í hesum førinum her, haldi eg, at fyrst og fremst er málið ógvuliga prinsíppielt. Tað er í og fyri seg ikki persónurín, ið tað snýr seg um, men tað er viðgerðin hjá myndugleikunum av einum trupulleika, ið hetta málið snýr seg um. Viðgerðin av hesum máli er, so vítt eg havi fylgt við, ið hvussu er tann, at man metir seg at hava havt trupulleikar við skúlan í Vági, og so hava skúlamyndugleikarnir roynt at komið burtur úr hesum trupulleikunum, og tað er so enda hjá landsstýrinum, sum hevur avgjørt at gera eina tænastumannakanníng.

Ein tænastumannakanning er fyri so vítt eitt ógvuliga alment fyribrigdi soleiðis, at tað verður viðgjørt í fjølmiðlunum, tað verður viðgjørt alment, og tí er tað í og fyri seg ikki ónáttúrligt, at tað eisini kann hava

møguleika fyri at verða viðgjørt á tingi. Tann myndugleiki, sum hevur avgjørt hetta, er jú Føroya landsstýri. Føroya landsstýri er, sum tað er valt av Føroya løgtingi, tann útinnandi politiski myndugleikin meðan Føroya løgting er tann löggevandi fólkavaldi myndugleikin í landinum, og Føroya løgting hevur sjálvandi ábyrgdina av at ansa eftir, hvat landsstýrið, sum Føroya løgting hevur valt, ger í ymsum málum, eisini einum slíkum sum hesum. So vítt eg havi skilt praksis í øllum førum, er tað soleiðis, at um ein tænastumannakanning fer fram, og um ikki nakað specielt hendir í mróan, so verður antin persónurin suspenderaður beinanveg, ið tænastumannakanningin byrjar, ella verður hann ikki suspenderaður, og tað eigur tí ikki at verða gjørt nakað, meðan kanningin fer fram, ið hvussu so er ikki, tá ið hon er farin fram í so langa tíð, sum í hesum førinum. Tað haldi eg, at tingmen ið hvussu so er hava loyvi til at hava eina meining um, og tí haldi eg eisini, at tað er rímiligt, at landsstýrisins avgerð verður roynd í tinginum.

Vit fáa jú landsstýrisins gerðabók til viðgerðar á hvørjum ári, og tá kemur í prinsippinum hvør einasta avgerð hjá landsstýrinum til viðgerðar í tinginum og skal roynast í tinginum og harvið skal nan staðfesta, um tingið góðkennir landsstýrisins avgerðir í tí farna árinum ella ikki, ella um tingi hevur viðmerkingar til tær ymsu avgerðirnar. Tí er einki órímiligt í, at landsstýrið í hesum máli eins og í einum og hvørjum øðrum máli, sum tað tekur avgerð í, má standa til svars fyri tinginum, og tað haldi eg eisini má kunna lata seg gera her, og tí var tað, at vit atkvøddu í móti ella ikki gingu við til at atkvøða fyri, at málið varð afturvíst úr tinginum.

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Tað, sum hevur týdning við hesum málinum her, sum tað liggur, tað er royndin hjá uppskotstillarunum at fáa løgtingið at áleggja landsstýrinum at bíða við suspensiónini, til úrslitið av tænastumannakanningini

fyriliggur. So hevur landsstýrið ið hvussu so er ein møguleika at gera av, um nakað grundarlag er fyri suspendering ella um álvarsom brot eru farin fram og tað eigur ein slík kanning at visa. Hvat annað enn suspendering kann verða neyðugt? Eg ætlaði at spyrja løgmann, um tað ikki var so, at landsskúlastjórin hevði kvept seg eitt sindur við at seta hesa kanningina í verk, men landsstýrið álegði honum ella beinleiðis dómsvaldinum at fara undir hesa kanningina og útnevndi so dómsleiðara og um so er, og undir øllum umstøðum so haldi eg kortinil eisini, at tað er rætt, at landsstýrið, tá tað sjálvt hevur sett eina kanning í verk sum umfatar 14 fólk, má kunna bíða, til úrslitið av tí kanningini fyriliggur og handla út frá niðurstøðuni hjá hesari dómsnevnd. Tí tað kann ikki verða rætt, at blanda tingini soleiðis saman, at eingin munur er á tí lóggevandi og tí dømandi valdinum. Hetta málið er jú rótað inn í allar triggjar hornasteinarnar í demokratiinum, teir skulu jú verða óheftir, løgtingi fyri seg, tað útinnandi valdið fyri seg og dómsvaldið fyri seg.

Landsstýrið hevur biðið dómsvaldið um at kanna eitt ávíst mál, sum er farið fram í fyrisitingini, tann kanningin er ikki liðug. Landsstýrið hevur ikki stundir til at bíða eftir kanningini, tað skal kanska okkurt gerast áðrenn løgtingsvalið, tað vil siga, at málið hevur politiskar yvirtónar og ikki tænastumannayvirtónar, og tá ið fjáltið kemur á menn í Tinganesi um, at kanska verður úrslitið av kanningini ikki, sum vit høvdu ynkst okkum, um tað skuldi verið politiskt eg veit ikki, eg spyrji bara, so mugu vit heldur handla "før tilfældet". Also vit grípa inn í procedurina, sum dómsvaldið annars hevur og kuta av stokkinum. Nú eigur man kanska at lata verða við at brúka orðið forfylging í hesum førinum, tí tað er so ringt at diskutera orðið forfylging við flokkar, sum hava langt síðan tikið deffinitiónsrættin upp á øll hasi tingini har, tí í hesum málinum eins og í øllum øðrum málum, har er vinstrarørslan, hon hevur jú skrivað spælireglarnar, hon er dómari í spælinum, og hon er altið annar parturín í spælinum. Tað vil siga, at tá ið tit hava tikið deffinitiónsrættin millum rætt og skeivt og

gott og ónt, so hava tit jú eisini loyvi til at føra tykkum fram og bera tykkum at, sum tykkum lystir, eisini at siga, at onnur gera mistøk.

Sum sagt, hetta uppskotið miðar fyst og fremst í móti at geva dómsvaldinum ein møguleika at koma til botns í kanningini, sum umfatar 14 fólk og ikki bara 1. Eg fari at heita á løgtingið um at taka undir við uppskotinum, tí úrslitið frá nevndini liggur ikki langt burtur, og tá skuldi verið rikiligur møguleiki til at tikið eina avgerð í málinum. Hvat tí endaligu kompetangcuni at siga upp ella suspendera viðvíkur, so víta vit jú, at løgtingið hevur yvirtikið større og større part av fyrisitingini og tí ivist eg ikki í, at undirvísingarmálaráðið helst vildi sloppið undan at verið blandað upp í hesa ógvuligu atferð, sum nú landsstýrið hevur gjørt murandi meira ótespuliga, men spurningurin er, hvat bókstavurin í lógini sigur. Soleiðis sum lógin frá 1972 og 1978 er orðað, so skuldi ikki verið nakar ivi í, at kenslumálaráðið hevur síðsta orðið í málinum. At so kenslumálaráðið kanska vil visa landsstýrinum ta sønd prinsippielt at læta landsstýrið taka avgerð við slíkum málum eins og í øðrum fyrisitingarligum málum í skúlaverkinum sum í øðrum, tað er ein heilt annað mál.

Nú hevur man enn í Føroyum rætt til, at fara til dómsvaldið aftan á, at løgting ella landsstýrið hava tikið sínar avgerðir, og enn er tað væl soleiðis, at løgting og landsstýrið eisini mugu rætta seg eftir tí, sum dómsvaldið avgerð í slíkum málum sum hesum, men tað, sum er harmiligt er, at her er ein proces byrjað, faktisk eitt brúk av makt, eg vil ikki siga misbrúk av makt, men eitt brúk av makt, sum fær óendaliga keðiligar fylgir fyri nógv fólk.

Eg skal ikki taka smámunir framaftur, tí at tað hevur verið nógv skrivað og tosað um hetta málið, men eg fari at heita á løgtingið um at taka undir við uppskotsstillarunum um at bíða, til úrslitið av tænastumannakanningini fyriliggur soleiðis, at landsstýrið kann vita, um nøkur sum helst grund er fyri suspensión ella øðrum tiltøkum. Takk fyri.

Adolf Hansen (fr.) viðmerking

og noyðast at rætta misskiljingar, tí skal eg ikki kommentera nakað av tí, sum Óli Breckmann segði um, at landsstýrið hevur handlað "før tilfældet", og at landsstýrið kundi biðað til tess, at man hevði vissu fyri, at grund var fyri suspensión.

Nú er suspensión ein fyribils avgerð, sum einki sigur um nakra endaliga avgerð. Hon má tí byggja á eina meting, eina meting um viðurskiftini við skúlan, um tey eru trygg ella ótrygg. Tað er helst rætt, at tað hevði verið munandi betri, um henda avgerðin var tikin longu í 1985, tí tá fyrilá óguliga lítil ivi um, at viðurskiftini vóru ótrygg, bert tað, at uppskot fyrilógu frá landsskúlafyrisitingini um serligar reglur fyri virksemi stjórans, serligar reglur fyri virksemi læraranna og í heila tikið serligar reglugerðir fyri ein ávísan skúla, sum víkja frá tí, sum er galdandi við allar aðrar skúlar í Føroyum og-enntá, at man umhugsar at býta skúlan í tvey. Tað skuldi eingin ivi verið um, at man kundi ivast um tryggleikan í arbeiðsviðurskiftunum við skúlan. Tað varð ikki gjørt.

Nú tosa menn um tey 3 útinnandi valdini, útinnandi, lóggevandi og dømandi vald. Røðarin Óli Breckmann tosaði um, at tað dømandi valdið arbeiddi við málinum, tað er misskilt so grundiga, sum tað yvir høvur kann gera. At landsstýrið hevur biðið dómsvaldið fremja eina kanning, er beinleiðis skeivt. Tað einasta, sum fyriliggur í hesum málinum, er, at dómarin hevur gjørt landsstýrinum tann beina, tað hildu vit ið hvussu so er, at hann gjørdi at útpeika ein forhoyrsleiðara. Landsstýrið kundi av sínum eintingum útpeika forhoyrsleiðara sum ikki nýtist at verða tilknýttur dómsvaldinum, sum kundi verið ein løgfrøðingur ella ein og hvør annar hampamaður ella hampakvinna í hesum samfelagnum, so hetta hevur einki við dómsvaldi at gera. Dómsvaldið er als ikki upp í blanda hesum máli, og tað fremur sostatt onga kanning. Tað hevur sjálvsagt sína náttúrligu grund, tí tað skal eisini verða soleiðis sum er framført her, at einum og hvørjum borgara er tryggjað, aftan á at endalig avgerð fyriliggur í einum máli, at reisa málið fyri dómsvaldinum, sum sjálvsagt tá ikki skal prædudecera sína støðu við at hava úttalað sína støðu frammanundan.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Tað er mangt komið fram, m.a. var tað løgmaður sjálvur, sum vildi vísa á, at teir einastu, sum høvdu gjørt hetta málið politiskt, tað vóru vit ella tann flokkur, sum eg umboði.

Hetta kenna vit aftur, tá ið avgerðir m.a. av løgmanni og tí flokki, hann umboðar og aðrir so royna at mótarbeiða ella átala tær niðurstøður, sum hesir menn so javnan hava pískin á lofti og leika í um, ikki fyri at brúka málburðin millum løgtingsformannin og løgmannin fyri ikki so langari tíð síðan, tá hesir cirkusklovnarnir ikki akta.

Tá ið so hesir loyva sær at hava aðrar meiningar og ávísa skeivleikarnar, hvussu so tað, sum man sjálvur er sannførdur um at verða skeivleiki, ja, so verður tað útlagt, sum um tað eru tit, sum royna at gera málið politiskt, tað eru tit í "skinhelligheit", og tað eru tit og tit. Nei, harra formaður, her eigur løgmaður at taka í egnan barm, hann veit betur, hvussu leikur veruliga er farin fram í hesum máli. So verður tað eisini upplýst her, at tað hevur ikki trýst verið lagt á forhoyrsleiðaran. Nú veit eg ikki, hvørjum definetiónin av trýst liggur hjá harra løgmanni.

Harra formaður. Mær vitandi eru ofta úttalilsir komin frá landsstýrinum, har mannagongdin hjá forhoyrsleiðaranum hevur verið átalað fyri at hava drigið út, seinkað, hann liggur oman á málinum o.s.fr. So kundi man sagt, at hetta er ikki nakað sum fjølmiðlarnir hava endurgivið skeivt.

Tað fyriliggur eisini okkurt meira ítøkiligt, har landsskúlaráðið eftir áheitan frá landsstýrinum hevur fingið álagt at útpeika nýggjan forhoyrsleiðara, hetta var aftaná, at eitt gott ár var farið frá tí, at kanningin skuldi verið byrjað. Forhoyrsleiðarin skuldi skiftast út. Nei, harra formaður, tað kunnu verða ymsar meiningar um, hvar definitiónin liggur.

Jú sanniliga hevur trýst og tað í stóran mun verið lagt á teir, sum hava fyrisitið hesa kanning og tá verður enn tá ikki havt í huga, at avvarandi myndugleikar eru deils sjálvir orsøkin til, at tað gekk so seint, sum

tað gjørdi við at koma í gongd við kanningini, tað verður ikki havt í huga.

Harra formaður. Nú verður tað so brúkt sum undanførslu, hóast tað eru 3 ár síðan og hóast tað er komið upp undir land við hesi kanning, so verður tosað um ótrygg viðurskiftir. Onkur hevur málborið seg soleiðis, at hesa tíðina hevur friður verið innandura í Vágs skúla, men uttan fyri hevur ódnin leika á. Frá hvørjum? Har kundi kanska verið áhugavert at trivið í okkurt av tí, sum hevur til deils verið at sæð í føroyskum fjølmiðlum, har Jacob Hjortshøj, sum er advokatur og fult so kvalifiseraður sum eitt nú ráðgevarin hjá landsstýrinum í hesum máli, úti í landsstýrinum. Hvør hevur suspensiónsrætt og ikki. Har verður m.a. sagt, aftur hava løgmans orð í huga, viðvíkjandi ótryggum viðurskiftir.

Við formansins loyvi, loyvi eg mær at endurgeva nakað her. "Grundlaget for suspension. Som nævnt ovenfor, er landsstyrets begrundelse for iværksættelse af suspension den samme som i sin tid begrundede den tjenestelige undersøgelse. Det siger sig selv, at jeg i dette brev hverken kan eller vil fremkomme med oplysning om det forhold som har dannet grundlag for tjenesteundersøgelse. Jeg kan derimod oplyse, at skoleinspektøren støttes af et større antal personer så vel lærere som forældrekredsen, at kritikken af skoleinspektøren kan henføres til en meget lille gruppe af personer og at ikke en eneste af klagerne på Våg skole, selv ikke skoleinspektørens argeste modstander har kunnet rejse kritik af skoleinspektøren for hans tjenesteførelse eller samarbejde i perioden efter starten af skoleåret 1985/86, det vil sige for de seneste 2 skoleår." Hvat er so harra formaður at brúka sum grundgeving her og nú um ótrygg viðurskiftir? Væl saktans er tað innanveggja, sipað verður til.

Eg kann illa fyristilla mær, at løgmaður, frá tingsins røðarapalli fer at tosa um tað, sum lærarafelagið brúkar, tað manipulatión, sum er farin fram uttanífrá. Tað er væl ikki tað, sum løgmaður meinar við, tá ið hann tosar um ótrygg viðurskiftir við Vágs skúla.

Harra formaður. Eg vóni, at hetta uppskot fær ta lagnu, sum sjálvandi eftir mínum tykki og eftir tykki

hjá øðrum løgtingsmonnum hevur uppiborið nevnliga, at suspenderingin verður afturtikin. Tað verður álagt, at hon verður afturtikin inntil tænastumannakanningin fyriliggur.

At Adolf Hansen nú kemur upp og tosar um øll hesi 3 ymsu valdini, tað sigur mær ikki so ógvuliga nógv, tí hansara primera uppgáva má væl verða í hesum føri at løna aftur, ja, fyri hvat? Fyri trúskap frá hinari síðuni, og vit skulu bara minnast til, at tá ið tænastumannakanningin á sínni varð sett í verk, hvat sami løgtingsmaður fóraði fjølmiðlarnir við tá, havandi tað í huga, so er hetta eitt spæl fyri galarínum bæði hjá Framsóknarflokkinum og hjá Sjálvstýrisflokkinum í hesum máli, sjálvt um teir kunnu siga, at vit atkvøddu í móti málinum í landsstýrinum.

Formaðurin

Tað vóru ikki fleiri, sum hava biðið um orðið, so er orðaskiftið endað og tað er ikki komið uppskot um nakra nevnd, so at málið verður beint beinleiðis til 2. viðgerð.

So kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 14, tað er broyting í fólkatingsvallógini. Hvør biður um orðið? Tað er eingin sum biður um orðið. Málið verður beint í rættarnevndina.

So kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 13, tað er løgtingslóg um útbúgvingarstuðul.

Jóannes Dalsgaard (jv)

Harra formaður.

Eg vil nýta høvi til, at takka landsstýrinum fyri, at hetta uppskotið er komið á tingborð.

Eg kann boða frá, at Javnaðarflokkurin tekur undir við tí, og annars skal eg heilt stutt siga nøkur fá orð um sjálvt uppskotið. Tað er ein fylgja av, at Statens Uddannelsesstøtte er komin í blokkstuðulin; tað hevur verið rættiliga stórur áhugi fyri hesum málinum millum ungfólk og foreldur, líka síðan blokkstuðulin varð samtyktur. Ætlanin við hesum er, at skipa tann føroyska partin av

S.U. blokkstuðlinum við lóg og lógin umfatar bara tey, sum eru undir útbúgving í Føroyum. Lógin byggir á stórt sæð somu prinsipp, sum tann danska S.U.-skipanini, men av tí at eftir hesum uppskotinum verða veitingarnar skattafríar, so eru tær nakað lægri enn í Danmark. Heimabúgvandi undir 18 ár fáa 8.000 kr. árliga, yvir 18 ár 18.000 kr. og útbúgvandi yvir 18 ár fáa 28.000 kr. og skipanin er tann vælkenda, partvís beinleiðis studningur og partvís lán.

Í lógini verða ávísar treytir nevndar, meðan aðrar treytir skulu setast við kunngerð, og tað vil alt verða hips um haps, fyrí mær kundu gott allar treytirnar staði í eini kunngerð, og eg haldi eisini, at tað hevði verið líka skilagott, at upphæddirnar stóðu í kunngerð, men av tí at eg gangi út frá, at hetta er ein fyribils skipan fyri at kunna koma í gongd, fyri at kunna nýta okkara egna S.U., so verður høvi til at venda aftur til sjálva lóggávuna kanska um 1 ár. Ikki vist, at vit, sum standa her, verða við til tað viðgerðini, men vit mugu vóna, at teir, sum tá verða, verða líka skilagóðir, sum vit.

Tað besta hevði sjálvsagt verið harra formaður, um vit sluppu frá lánum um allur stuðulin kundi verið veittur sum studningur, men tað letur seg nokk ikki gera, soleiðis sum støðan er. Tað er tó ein stórur fyrimunur at vit eru sloppin frá teimum dýru banklánunum, og at lán nú verða beinleiðis veitt úr stuðulsstovninum.

Hinvegin veit eg ikki, hvussu beint tað er, at forrenta lánini í útbúgvingartíðini, tað skulu tey gerast, so vítt sum eg havi skilt, við trimum prosentum undir vanliga rentu. Tað kann hóast tað verða ein rættiliga lág renta, tað kann gerast ein rættiliga tung byrða aftan á 5-6 ára útbúgving, sum fara undir langar útbúgvingar. So tað skulu vit nokk hyggja eitt sindur at í nevndini.

Síðan verður umtalað, at útbúgvingarstuðulin skal verða umsitin av einum stuðulsstovni. Eg fari at spyrja landsstýrismannin um tað nú er neyðugt at gera ein serstakan stovn til at umsita 4000 umsóknir, um ikki tað kann gerast í útbúgvingardeildini, ella hvat tað nú eitur úti í Tinganesi, sum verður skipað um ikki so langa tíð, og tað er jú møguleiki eftir eini grein her í grein 10 stendur jú, at stuðulsstovnurin kann fyrisitast

av øðrum stovnum, so eg haldi, at tað skulu vit tosa eitt sindur við landsstýrismannin um í nevndini.

Harra formaður. Vit taka undir við hesum uppskotinum, sum tað fyriliggur, men tá ið tað er sagt, so skal tað ikki dyljast, at Javnaðarfloksins prinsippiella støða er, at vit skulu hava útbúgvingarløn í staðin fyrí útbúgvingarstuðul og tað haldi eg eisini, er støðan hjá landsstýrismanninum.

Vit hava báðir luttikið á fundum í Norðurlandahúsinum, hvar vit, ið hvussu so er, hava latið fólk vita, at útbúgvingarlønin er tað rætta. Men tað er klárt, at tað er ein so stór skipan og so umfatandi arbeiði at skifta yvir til útbúgvingarløn, at tað sjálvsagt ikki kann greiðast við tí skotbrái, vit hava nú. So vit mæla til, at samtykkja tað, sum tað fyriliggur, kanska við onkrum smáum broytingum, men at vit so heita á landsstýrið og landsstýrismannin, vónandi verður hetta landsstýrið sitandi eisini aftan á valið, at arbeiði við spurninginum um útbúgvingarløn.

Eg skal bara taka aftur í aftur heilt stutt um lánini, at tað vilja vit hyggja eitt sindur at í nevndini, tí at hesar lániskipanir eru ongartíð av tí góða. Tað er lætt at koma í trupulleikar av lánum, sanktiónirnar eru harðar, tá ið tey ikki verða hildin við líka, og tað kann verða nokk so tungur kleppur. Tað kann man kanska hyggja at í framtíðini.

Harra formaður. Eg mæli til, at hetta fær nevndarviðgerð í skúla-og mentamálanevndini, sum skuldi kunnað avgreitt hetta skjótt og væl, tí tað eru ikki nøkur serlig bein í hesum uppskotinum.

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Eg skal ikki leggja nógv aftrat, eftir sum eg skilji, at málið fyrst og fremst snýr seg um stuðul til teirra, sum lesa í Føroyum. Hinvegin so vita vit, at ein stórur partur av tørvinum á einum munagóðum lestrarstuðli liggur millum føroyingar, sum lesa uttanlands, og eg skilji á lagnum, at ein reglugerð verður gjørd fyri tey fólkini, og kanska eisini ein lóg sum henda her,

Tað er jú gleðiligt og gott, at vit nú taka fulla ábyrgd ikki bara fíggjarliga men eisini fyrisitingarlig av hesum her týdningarmikla spurningi hjá einum framkomnum samfelag.

Lat meg kortini skoyta upp í, og tað var tí eg bað um orðið. Føroya Iðnaðarfelag boðaði her fyri til fundar, limum úr MFS og LFÚ útbúgvingarfelagnum fyri lesandi, eitt umboð fyri føroyskar lærlingar var eisini til staðar, og so vóru onnur fólk biðin við á fundin. Til viðgerðar tá var spurningurin um útbúgving aðra staðir enn í Danmark ella aðra staðir enn í Skandinavia. Tað skal verða mín vón, og nú veit eg ikki, hvussu nógv landsstýrismaðurin fær stundir at gera aftrat í hesum her máli, tíðin fer at styttast hjá okkum øllum. Hvør verður við her, tað vita vit ikki, men skuldi so verið, at landsstýrið arbeiðir víðari við málinum og roynir at gera lógina fyri føroyingar, sum lesa uttanlands, so fari eg at heita gjøgnum formannin á landsstýrið um at hava samband við fulltrúan og hava samband við iðnaðarfelagið, við meginfelagið og LFÚ eisini hetta og til landsstýrisskeiðið er úti, um at gera serligar reglur ella serligar møguleikar fyri føroyingar, sum fara aðra staðir at lesa enn til Danmarkar, ti stuðulsmøguleikarnir hjá teimum eru púra heftir av tí upphæddi, tí lóg og reglugerð, sum vit gera fyri hesi fólkini.

Tá ið nú eitt so stórt og breitt ynski er framsett, tað var also iðnaðarfelagið, sum kom við hugsanini um at fáa føroyingar at lesa aðra staðir serliga í samband við handil uttanlands, framleiðslu, útflutning, innflutning eisini so fari eg at heita staðiliga á landsstýrið um veruligt at gera serligar útvegir fyri fólk, sum kunnu hugsa sær at lesa aðra staðir enn í Skandinavia. Takk fyri.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Tað er hetta málið viðvíkjandi løgtingslóg um útbúgvingarstuðli, sum er til viðgerðar. Eg taki undir við hesum málið. Nú hevur tað verið frammi ofta hetta, hvussu truplar umstøðar lesandi hava, og tí skal landsstýrið hava tøkk fyri, at teir eru komnir við hesum

uppskoti.

Ein afturvendandi spurningur hjá ungum fólki eitt nú í Havnini serliga hevur verið at fáa sær tak yvir høvdið. Hetta er ein stórur trupulleiki, sum hevur gjørt seg galdandi, hetta yvirhøvur at fáa nakað at búgva í. Tað hevur ofta verið havt á munni her frá tingsins røðarapalli hesin trupulleiki, og sjálvur hevði eg uppskot í sínari tíð og Sambandsflokkurin hevur eisini havt eitt uppskot seinni um, at tey, sum leigaðu út, skuldu hava møguleika ikki at verða skattaði av fullari leiguinntøku. Hetta vildi óivað hjálpt til, at hesi, sum hava rúm standandi, leigaðu út til unga fólkið, til lesandi at gagni. Vit kunnu spyrja hjá LFÚ, hvussu støðan er har, og har fáa vit ið hvussu so er tað fatan, at tað er sera trupult hjá ungfólki at fáa tak yvir høvdið.

Harra formaður. So er tað eitt annað, sum ofta verður havt á málið. Tað er hetta, tá ið menn og kvinnur hava lisið eitt ávíst áraskeið, hevur tað vist seg, at tey orsaka av lántøku, við loknu útbúgving eru sera hart fyrispent, hvat rentum og avdráttum viðvíkur. Hesi somu, sum eru komin í aldur, har tey skulu fínna sær nakað at búgva permanent, fáa tak yvir høvdið, at búseta seg, tað verður seg í høvuðsstaðnum ella aðra staðir í samband við arbeiði, og familja verður sett á stovn o.s.fr. Harra formaður, tí kundi eg hugsað mær í samband við fyriliggjandi uppskot at spurt landsstýrið og ta nevnd, sum kemur at viðgerða hetta, um tað ikki var gjørligt, at hesi, sum hava møguleikan við hesum uppskoti at taka lán frá landsstýrinum, at rentan fer ikki at verða tilskrivað fyrr enn við lokna útbúgving og ikki, tá ið lánið verður tikið í byrjanini av lestrartíðini. Hetta vildi verið ein munandi lætti hjá hesum, tá ið tey vóru liðug við útbúgving, at tey líka sum kundu fingið endarnar at rokkið. Tað er bara hetta, sum eg vil leggja aftrat hesum, at rentutilskrivingin ikki fellur í sjálvari lestrartíðini, men ikki fyrr enn útbúgvingin er lokin. Takk fyri.

<u>Eilif Samuelsen</u> (sb.)

Harra formaður.

Nú er so endaliga komið uppskotið um, hvussu tann føroyski útbúgvingartstuðulin skal verða sum ein avleið-

ing av tí blokkstuðulsskipanini, sum vit hava fingið. Tað hevur verið tosað um, og tað framgongur eisini av hesum uppskotinum, at tað eru bara tey, sum lesa í Føroyum, sum koma undir hesa skipanina. Tey, sum lesa í Danmark, tey fáa á sama hátt sum áður S.U. studning niðri, og har aftrat hevur tað verið soleiðis, at hesi seinastu árini hava tey, sum lesa niðri, fingið eitt ískoyti frá landsstýrinum, og tað hevur verið forsvarað á tann hátt, at føroyingar hava eina størri útreiðslu til at ferðast, enn hvat tey tilsvarandi í Danmark hava fingið.

Nú vita vit jú tað, at teir føroyingar sum lesa niðri, hava óvanligar góðar umstøður viðvíkjandi skatting, teir kunnu vinna upp til einar 50.000 kr. uttan at verða skatta av tí, tað er ein nógv betri skipan enn, hvat ið teirra donsku javnaldrar hava. Tað hevur eisini verið pressað á fyri at fingið hækkað tað føroyska ískoytið til tey, sum lesa niðri, men har hevur tað verið soleiðis, at landsstýrið hevur í gjøgnum nógv ár verið afturhaldandi við at lata ov nógv nevnliga tí, at føroyingarnir á tann hátt skulu verða betur fyri enn teirra samlesandi á stovnum niðri.

Tey, sum hava lisið í øðrum londum, hava fingið S.U. sama hátt líka mikið, hvar tey hava verið, um tey hava verið í Onglandi ella Týsklandi ella í hinum Norðurlondunum, tey sum lesa á fiskivinnuskúlum í Noregi, tey hava eisini fingið frá S.U., men hvussu tað er nú aftaná, at vit hava fingið blokkstuðulin, tað eri eg ikki heilt greiður yvir, men tað veit kanska landsstýrismaðurin at greiða nærri frá.

Sambandsflokkurin meinar, at vit skulu arbeiða fram ímóti, at tey ungu eiga at fáa bara studning tann fyrra partin av lestrartíðini, og at lánini ikki skulu koma fyrr enn seinna partin, tí tær royndirnar, sum m.a. í Danmark hava verið gjørdar av hesum láninum, hava verið ógvuligar ringar, kann man siga. Tað hava verið stórar mongdir í milliardavís, sum hava verið eftirgivnar, tí tað hevur verið ómøguligt at fingið hesi lánini inn aftur, tí tey hava verið ov dýr og tað hevur verið ringt hjá teimum, sum hava lisið, at goldið tey aftur aftan á og eisini tað, at um tað bara verður latið studningur tann fyrra partin, serliga um tey halda seg innan fyri

ta normeraðu tiðina, so vil tað eisini anomera til at tey gera seg lidnan skjótast gjørligt og eisini tað, at tað ikki tá verður neyðugt við at hava so nógv arbeiði við síðuna av. Tað hevur verið talan um útbúgvingarløn, Sambandsflokkurin hevur verið í móti hesum uppskotinum um útbúgvingarløn, at tey ungu bara skulu fáa lønina, men hava meint tað, at tað var betri í tráð við liberalan politikk, at tað hevur verið ein partur av sjálvsfigging uppi í hesum her, men at studningsmøguleikarnir skulu gerast lagaligari. Hetta uppskotið er gjørt eftir ti donsku S.U. skipanini, og til hesa skipanina havi eg ikki so nógvar viðmerkingar, hetta sær út til at kunna verða dekkandi fyri tað brúkið, sum tað skal til. Tað er eitt, sum vit kunnu hyggja eftir í skúla og mentanevndini, í grein 2, 4. stk. verður tosað um ungdómsútbúgvingar og hægri útbúgvingar, hægri útbúgving hvør skal siga, hin útbúgvingin er lægri. Hatta úttrykkið er nokk ikki gott, tað er betur at býta tað í ungdómsútbúgvingar og víðarigangandi ella framhaldsútbúgving, tað hevur verið brúkt eisíni, eg meini, at tað er eitt betri úttrykk fyri hasum har.

Annars verður sagt her, um hesi tølini, at tey føroysku eru lægri tí tað skal ikki svarast skattur av ti. Nú veit eg ikki, at landsstýrismaðurin hevur tey tølini presald. Um nú tey høvdu verið skattað, hvussu høvdu tey svarað til hvørt annað, tað vil siga, hvat hevur tann danski studenturin eftir, tá ið hann hevur goldið skatt, og hvat vildi tann føroyski havt tilsvarandi eisini, men tað man helst passa nøkulunda rætt. Nú standa ikki meir enn hasi beru tølini. Eru nakrar aðrar treytir, ella kann man vænta, at tað koma aðrar treytir í kunngerðum um hesar stuðulsupphæddirnar eru tær bundnar at nøkrum? Sambandsflokkurin meinar prinsipielt, at allar stuðulsupphæddir eiga at verða, tá ið tey lesandi eru yvir 18 ár, so eigur tað í øllum førum at verða leyst av inntøku hjá foreldrunum.

Tað stendur her, at tað kemur at kosta 25 mió.kr. plus 7 mió.kr. aftrat í ferðaíkoyti. Á figgjarlógini síggi eg, at í grunnurin til útbúgving eru avsettar 47 mió.kr. sjálvandi hasar 32 mió.kr., sum hatta kostar, har eru 25 mió.kr. aftrat sjálvandi, tað verður til

hetta her. Men í hvussu so er, so fáa vit í blokkstuðli av hesum her í 1987 21 mió.kr. og komandi ár verða tað kanska 2-3 mió.kr. meira. So vit siggja tað, at ein stórur partur av hesum stuðlinum er framvegis danskir pengar, og sjálvandi tað hitar eisini í hesum her, tað er tað, jú tað ger.

Eg vil mæla til, at hetta uppskotið fær viðgerð í skúlanevndini og eg hugsi ikki, at tað verður so nógv at gera við hetta uppskotið. Vit skulu lata tað fáa sína roynd, og eg meini eisini, sum Jóanes Dalsgaard nevndi, at tað má kunna lata seg gera, at seta hetta í gongd uttan alt ov nógv buerokratiskt roks burtur úr tí við setan av stjórum og nógvum fólki og skrivstovum og so viðari.

Signar Hansen (tf.)

Harra formaður.

Eg vil taka undir við, at hetta málið verður viðgjørt í løgtingsins skúla-og mentunnarnevnd, og vit vilja geva hesum málinum eina sakliga viðgerð.

Eg kann siga, at vit í Tjóðveldisflokkinum fegnast um, at tað nú hevur eydnast okkum at fingið hesa lógina framda. Vit meta hetta verða eitt stórt framstig, og vit hava arbeitt nú tey síðstu árini, løgtingið og samgongan, fyri at fingið størri upphæddir á okkara egnu fíggjarlóg, og tað er at vóna, at hesin parturin, sum føroyingar rinda, verður upp aftur størri, enn hann er higartil.

Tað eru tó ávísar viðmerkingar her í landsstýrisuppskotinum, sum eg kanska ikki skilji heilt, og sum eisini aðrir røðarar hava verið inni á, og tað er hetta, hvørja ávirkan hetta kemur at fáa á umsøkjarnar. Tað, sum eg hugsi um, tað er tað, hvør munur verður millum teir, sum t.d. fara niður at lesa og teir, sum fara til onnur lond. Tað er soleiðis í dag, at fleiri eru teir, sum fara til Noregs, Svøríkis og til Íslands at lesa. Nú er ein frágreiðing givin viðmerkingunum her, men tað hevði verið áhugavert at fingið at vitað, hvussu teir eru stillaðir í mun til teir, sum fara niður til Danmark at lesa. Vit í Tjóðveldisflokkinum meina, at her eiga allir at hava teir somu møguleikar og umstøður, sum

teir, sum fara til Danmark fyri at fáa studning. Eg kann eisini taka undir við teimum røðarum, sum hava sagt, at vit mugu ansa eftir, at umsitingin við at býta henda studningin ikki verður ov stór, og tí hildið tað verið møguligt, at vit kundu lagt hetta arbeiðið inn á onkran stovn, sum vit frammanundan hava og her hugsi eg um skúlafyrisitingina. Hvat hevur landsstýrið gjørt, hevur man kanna møguleikar og hvørja ætlan hevur landsstýrið tosað um á hesum øki?

So er tað viðvíkjandi hesi nevndini, sum eitur stuðulsstovnurin, ein stuðulsstovnur, sum skal setast, og so verður sett upp í greinini 2, hvørjar uppgávur, hann skal hava. Her stendur á síðu 2 við formansins loyvi, hvat hann skal gera. Her stendur: Stuðulsstovnurin kann áseta nærri reglur fyri, hvørjar ungdómsútbúgvingar geva rætt til stuðul. B. Nærri treytir fyri stuðuli til hægri útbúgvingar. C. Um útroknan av stuðli fyri stytri tíðarskeið enn 1 ár. D. Um treytirnar fyri at verða roknaðir sum heimabúgvandi ella útibúgvandi. E. Stuðulstíðina. Tað vil siga, at stuðulsstovnurin sjálvur kann gera hesar reglurnar.

Tá ið talan hevur verið um aðrar líknandi stovnar, so hevur tað verið soleiðis, at vanliga so áleggur man tí stovninum at gera reglur, og eftir at hesin stovnurin hevur gjørt reglur, plagar tað at verða vanlig praksis, at uppskot frá teimum verður lagt fyri landsstýrið, sum síðan skal góðkenna tað. Eg siggi, at tað er ikki gjørt í hesum førum. Eg meini, at tað er gjørt í flestu førum, tí kundi eg hugsað mær at vita, hví hevur man ikki tikið tað við í hesum uppskotinum, var tað ikki skilabetri, at tað fór í gjøgnum tveir instancar til at viðgera júst hatta har. Harra formaður. Vit skulu geva hesum málinum eina sakliga og góða viðgerð og vit fegnast um, at málið nú er reist. Takk.

<u>Hilmar Kass</u> (sj.)

Harra formaður.

Hetta er eitt av teimum málum, sum av tí, at vit hava fingið hetta inn í tann blokk, ið vit samráddu okkum til við danir at umsita, hava fingið undir føroyskt lóggávuvald. Orsøkin til, at meginparturin av tí

ætlanini tók við frá 1. januar í ár, meðan hetta nústani kemur, er, at stuðulsárið hevur gingið frá 1. august til 1. august, og varð tí hildið rættast at lata tann stuðul sum játtaður var undanfarna ár, verða sum vanligt undir donsku skipanini, meðan vit so nú frá 1. august í ár koma undir føroyska studningslóg.

Tá ið vit lesa hetta uppskotið, er onkur munur og eg vil siga, at onkur av teimum er til stóran bata. Her hugsi eg serliga um tað, at inntøka og ogn hjá foreldrum og inntøka og ogn hjá teimum, ið søkja studning hevur verið knýtt at studninginum. Tað hevur sæð sera løgið, út fyri mær tá ið eg sum lærari á sjómanskúlanum hugsi, menn, sum hava verið til skips í fleiri ár og koma á skúlan, tað tal er nú, hóast alt lækkað, men tó undir 20 ár, ja, so er tað, hvat hava foreldrini fortjent, hava tit nakran møguleika at fáa studning, tað hevur verið heilt órimiligt og tí er tað mær ein gleði at siggja, at hatta er burtur. Umframt at tað hevur verið órimiligt, so hevur tað verið munandi tyngri at umsitið, gjørt nógv arbeiði, og sum hetta uppskotið er skipað, so áttu vit at kunnað fingið soleiðis, sum aðrir hava ynkst og-søkt, eina sera einfalda umsiting, sum eigur ikki at verða løgd í ein nýggjan stovn, men í ein verandi stovn, og tá ið Signar Hansen nevnir landsskúlafyrisitingina, so tykir tað mær at verða eitt skilagott uppskot.

Tað, sum hevur fallið mær mest fyri bróstið, sum eg havi umsitið nú í nógv ár á sjómansskúlanum, er, at teir næmingar, sum í summarfrítíðini hava verið hepnir og verið til skips og mannað tann undirmannaða flota okkara og hava gjørt tað hampiliga gott, ja so vísir tað seg, at nú hava teir tjent ov nógv, so nú skulu teir missa stuðulin, sum teir hava fingið játtaðan. Tað hevur verið sera órættvíst fyri mær at vísa seg, meðan teir næmingar, sum hava tikið sær av løttum í summarfrítíðini kanska hava verið uttanlands í ferju, teir fáa rætt til fullan studning. Teir, sum hava verið burturi og mannað okkara undirmannaðu skip, forvunnið pengar og goldið skatt av teimum pengunum, teir hava mist hesi rættindi. Tíbetur er hatta ikki víð í hesi lógini, so studningurin er ikki ávirkaður av, hvat næmingurin eigur ella hvør er inntøkan hjá næminginum, tí tað er, eftir míni hugsan skeivt at taka studning frá einum, sum í

summarfrítíð sini, roynir at vinna sær pening. Tað verður eisini her tosað um lánimøguleikar, og teir verða nevndir upp til 15.000 kr.

Nú skilji eg tað soleiðis, at um árið er heilt og næningarnir hava rætt til tann fulla studningin, sum er nevndur frammanundan, so skuldi tað ikki verið nøkur viðgerð av hesum málinum. So er tað 15.000 kr., sum er eitt bíligt lán serliga í lærutíðini og serliga so sum rentan, diskontoin hevur verið seinni í ár í Danmark. So skuldi hatta verið rættiliga einfalt.

Eftir gomlu donsku lógini var tað soleiðis, at tann, ið fekk játtað studning frá S.U., hevði møguleikar at fáa eit bíligt lán, sum svaraði til helvtina, av studninginum haraftrat eitt statsgarantið sum svaraði til restina av helvtini, so hann kundi læna líka nógv, sum hann fekk í studningin.

Eg skilji, at hatta er nú broytt soleiðis, at studningurin er hækkaður munandi frá eini 25.000 kr. fyri teir, sum fingu mest, upp til 36.000 kr. Men samstundis er tað garanteraða lánið, dýra lánið, er burturdottið soleiðis, at nú er bara møguleiki at fáa tað bíliga lánið, sum staturin gevur.

Tað er mælt til, at hetta verður viðgjørt í skúlanevndini, og tað taki eg undir við, og kann samstundis siga, at soleiðis, sum málið er útarbeitt í løtini, so hevði eg hildið, at tað kundi verið samtykt í tí líki, tað hevur, og eins og mangt nýtt. So kundu teir, sum tá verða her um 1 ár ella knapt tað, hugt eftir, um tað var nøkur ábót, sum var rætt at fingið framda.

Jógvan Durhuus (tf.)

Harra formaður.

Tað er viðgerð av løgtingsmáli nr. 13: Løgtingslóg um útbúgvingarstuðul. Eg skal fyrst takka øllum framsøgumonnum fyri flokkarnir, sum hava havt orðið fyri eina sakligara og positiva viðgerð. Tað er soleiðis, sum tað hevur verið sagt í viðmerkingunum, at við blokkstuðulsskipanini varð samtykt, at hetta var tað síðsta, sum skuldi koma í gjøgnum í tinginum, og vit høvdu freist fram til 1. august. Lógin er komin fram nakað seint, men hon verður ið hvussu so er afturvirkandi til 1. august.

Eg haldi, at eg fari at gera nakrar viðmerkingar til teir fyrispurningar, sum hava verið her, og royna at svara so væl, sum eg kann. Tað var Jóannes Dalsgaard, sum nevndi, at upphæddir og treytir kundu líka so væl staðið í kunngerð. Tað er soleiðis, at seta vit upphæddir og treytir í kunngerð, so hava vit mett, at tað kann verða rættiliga tilvildarligt, hvussu nú eitt landsstýri uttan um eitt løgting fer at broyta hesar upphæddirnar. Hin vegin, so stendur í lógini sjálvari, at upphæddirnar verða prístalsreguleraðar, so tað í sær sjálvum ger, at tølini koma ikki at standa í stað.

So verður tað sagt, at tað er ivamál, um tað er rætt, at lánini skulu forrentast so tíðliga í og við, at vit hava lagt so lítla rentu á sum 3% niðan fyri diskontoina, so hava vit mett, at hetta kann bert koma teimum seinni lesandi til góðar. Tí tann rentan, sum verður goldin verður lænt út aftur, tað verður eitt stovnsfæ hjá grunninum, men tað kann man so tosa um. Í hesum førinum er rentan lág og eisini, tá ið tey koma í vinnu, so skulu tey ikki byrja við at rinda aftur, fyrr enn 1 ár er líðið aftan á lokna útbúgving og tá 1% omanfyri diskontoina, men hatta er so upp til nevndina at taka støðu til og tingið. Okkara uppskot er at hava tað uppskotnu rentuna.

So hava fleiri, eisini Jóannes Dalsgaard, sum var tann fyrsti sum, spurdi, um tað er neyðugt við stuðulsstovnum. Tað er soleiðis, at vit kunnu kalla tað, hvat vit vilja, men onkur skal hava ábyrgd, og tá ið tað stendur stuðulsstovnur, so er tað soleiðis, at í eini grein her stendur eisini, at hesin stuðulsstovnur kann verða lagdur undir ein og hvønn annan almennan stovn, og tað hava verið samráðingar við landsskúlafyrisitingina, og vit hava biðið landsskúlafyrisitingina tikið hesa deildina inn til sín og eitt nú koyrt tað inn á kervið hjá teimum. Hetta verður so kanna nú og tað verður mett møguligt, sjálvt um sjálvur stovnurin ella sjálv deildin av neyðturviligum grundum hóast trotið noyðist at liggja uttan fyri sjálva landsskúlafyrisitingina, so ber tað til, at hava tað í neyvum samstarvi við hesa.

Jóannes Dalsgaard tosaði eisini um útbúgvingarløn. Eg skal ikki koma so nógv inn á tað, tí tað hevur verið eitt uppskot, sum vit hava havt til viðgerðar saman við

hesum her, men tað hava ikki verið stundir. Tá ið hann sigur, at vit vóru samdir um hetta her, so er tað bæði rætt og skeivt, tí vit vóru á einum fundi uppi í Norðurlandahúsinum, hvar eg segði, at eg metti, at tað at taka støðu til, um tað skuldi verða útbúgvingarløn, var so stórt mál, at tað, metti eg, skuldi hoyra upp undir eitt løgtingsval og í einum samgonguskeiði til at taka støðu til hjá eini samgongu, tað kundi man ikki gera í einum samgonguskeiði. So kann man kalla hetta, hvat man vil.

Eg vil annars siga, at tá ið tú fært studning, sum í hesum førinum verður 28.000 kr., um tú fært hann lutaðan út yvir 10 mánaðir, so kann man kalla tað, hvat man vil, men tá er tað ein skattafrí løn sum næmingurin far og um hann so tekur hesar 15.000 kr., sum er honum møguligt aftrat, so fær hann 4.300 kr. goldið út hvønn mánað, um vit taka tað yvir 10 mánaðir, og tað er sum man sigur líka mikið, hvat man kallar tað, eg vil eisini kalla tað fyri eina løn.

Munurin á tí sum Jóannes Dalsgaard hevur heilt generelt, tað er tað, at av útbúgvingarlønini, sum hann tosar um, har skal tú ið hvussu so er rinda skatt men ikki eftir hesum her, so kann man velja í millum, men tað skal eg ikki fara longur inn á.

So er tað Óli Breckmann, sum spyr um lesandi uttan fyri Føroyar. Tað er soleiðis, at studningsskipanin er soleiðis, at um lesandi koma til Føroyar uttanífrá, so koma tey eisini undir okkara stuðulsskipan, fara vit í Norðurlond, so kunnu vit eisini fáa studning, men í hesum førinum verður tað yvir S.U. skipanina, tað donsku, og fert tú út um Norðurlond eitt nú til Týskland og Bretland, um so er, at útbúgvingin lúkar treytir, sum S.U. annars setur, so fær ein næmingur, hvar hann kemur frá úr Norðurlondum, eisini stuðul á sama hátt, so tað ber til hjá føroyingum at fara uttanlands og lesa og fáa studning.

Tað var rættiliga áhugavert, sum Óli segði. Hann tosaði um, at Føroya Iðnaðarfelag hevði ein fund. Eg havi hoyrt um henda fundin, eg var ikki við á fundinum og var heldur ikki boðin við til hann, men eg vil eisini hava tað í huganum, tá ið vit gera serligar reglur, tí í lógini stendur, at tað verða gjørdar serligar reglur fyri tey, sum eitt nú liggja uttanfyrí tær reglurnar,

sum S.U. hevur sett fyri fólk, sum eru uttan fyri Norðurlond og lesa, tað hava vit so møguleika til at gera.

Tordur Niclasen kom inn á hvussu trupult tað var hjá fólki at fáa tak yvir høvdið. Teimum lesandi hava vit møguleika at geva stór lán, hækkað lán sambært eina lóg, sum var broytt fyri stuttum, og tað verður arbeitt nú við einum stórum projekti fyri studentaskúlanæmingar. Vit hava júst fingið eitt heim upp at standa sum býráðið hevur verið við til, til handilsskúlanæmingar, og vit hava avsettan pening til hetta á figgjarlógini, so her er ikki nakað, sum forðar fyri, men eg vil ikki koma inn á, hvørt tað er rætt at geva frádrátt til tey, sum skulu leiga út til lesandi. Tað kundi kanska verið tiltrongt í eini yvirgangstíð, men sum sagt, vit vóna heldur at vit fáa bygt kollegiir eftir ti lógini, sum heimilar hesum.

Tordur Niclasen kom inn á tað sama, tað skal eg ikki umrøða umaftur, tað er, um tað skal verða rentu-og - avdráttarfrælsi undir lestrartíðini, og at byrðan er so stór hjá teimum sum í dag hava lisið, tað er rætt. Tey, sum hava lisið, áðrenn henda lógin kom, hava í flestu førum verið noydd at tíkið eitt stórt statsgaranterað lán við bankarentu, og tey sita tungt í tí, men hetta skuldi so byrt upp í móti hesum.

Eilif Samuelsen kom inn á tey, sum lesa í Danmark, tey fáa S.U. studning, tað er tað sama og so ferðaískoyti frá landsstýrinum.

Tað er soleiðis, at ferðaískoytið frá landsstýrinum, hevur verið givið helvtin sum studningur og hin helvtin sum lán, eitt rentufritt lán. Av tí at ferðaútreiðslurnar millum Føroyar og útlond eru stórar og tað tykist sum, tað var ikki sum, tá Eilif Samuelsen og eg vóru burtur og lósu, at tey koma heim rættiliga ofta. Tey koma kanska heim tvær ferir meir enn, tað var fyrr, tey koma heim til páskar og tey koma heim til heystar. So kann man siga sum so, at tað kanska var ikki neyðugt at givið teimum studning og lán til tað, men tað er bara soleiðis, at tey koma tá, og tí hava vit væntað, at ískoytið verður tær somu 4.500 kr. í láni og 4.500 kr. í studningi.

Tað var eisini Eilif Samuelsen sum tosaði um tey, sum lósu uttanfyri Europa. Eg haldi eg svaraði upp á tað frammanundan, at tað verður sami studningsmøguleiki sum

higartil.

So var tað samanberingin við ta donsku skipanina og okkara egnu. Har er tað soleiðis, at vit hava roynt ið hvussu so er ikki at gjørt tey verri stillað, og eg kundi kanska tikið eitt brot um munin í millum føroysku stuðulsskipanina og galdandi donsku skipanina, um tað hevur áhuga. Stuðulin í Føroyum er undir ongum umstøðum treytaður av foreldrainntøkuni tað er eitt Í Danmark er fullur stuðul til tey 18-19 ára gomlu treytaður av, at foreldrainntøkan ikki er størri enn 167.000 kr. Fer inntøka foreldranna upp um hetta, verða stuðulsupphæddirnar lutvíst niðurskornar. Í Danmark verður ikki stuðul veittur fólki undir 18 ár, tað verður tað her hjá okkum. Føroyska lógin heimilar har aftur í móti eisini stuðul til fólk undir 18 ár, tað er, sum eg nevndi 10. floks næmingar í fólkaskúlanum m.a. Egininntøka, sum eftir galdandi reglum í Danmark, ikki má verða meira enn 34.000 kr. árliga, um man ikki skal missa stuðul heilt ella lutvíst, er als ikki tikin við sum treyt í føroysku lógini. Tað var í uppskotinum upprunaliga tá ið vit fingu tað, men tað hava vit so lúka burtur. Hetta erat skilja soleiðis, at um ein ungur maður eitt nú í summarfrítíðin fór og vann sær 100.000 kr., so skuldi ikki ein niðurtrapping fara fram í hansara studningi, tað er so ein bati. Tað vil siga, at stuðul verður veittur uttan mun til egininntøku umsøkjarans. Somuleiðis er eginogn eingin forðing fyri at fáa fullan stuðul, donsku reglurnar heimilað har afturímóti, at stuðulin verður skorin niður, tá ið egininntøkan er størri enn 100.000 kr. tí 75% av ognini yvir 100.000 kr., verður rokna sum egininntøka, hetta bert fyri at lýsa munin.

So var tað komið inn á tølini, sum eru í hesum um stødćina á teimum. Har er at siga, at vit hava 47 mió.-kr. standandi á fíggjarlógini nú, tá ið vit komu til hetta landsstýrið, var upphæddin 4 mió.kr. í 1985, hon var 8 mió.kr. í 1986 og hon var 10 mió.kr. 1987 og nú er hon 15 mió.kr., og vit hava skotið upp, at samlaði studningur til útbúgving nú er 47 mió.kr. harav er roknað við, at S.U. er 22 mió.kr., tað vil siga, at vit hava eina hækking frá 4,5 mió.kr. upp á 25 mió.kr. sum tann føroyska partin av hesum. So hevur tað verið roknað eitt

sindur upp á hetta av teimum, sum hava havt orðið, og tað er av góðum grundum, tí her stendur í viðmerkingunum, at mett verður, at henda stuðulsskipan við teimum upphæddum, nevndar eru í lógini, fer at kosta umleið 25 mió.kr. So stendur longur niðri sum síðsta, haraftrat verður mett, at umleið 7 mió.kr. fara at verða veitt føroyingum undir útbúgving uttan fyri Føroyar tað sokallaða ferðaiskoytið, so koma vit upp á 32 mió.kr og frá 32 upp á 47 er eitt lop. Hartil er at siga, har hava vit ætlað í reglugerð ella í kunngerð, at lærlingar, sum í dag á fyrsta ári fáa 25% av eini sveinaløn, fáa umleið 700 kr. um vikuna, skulu kunnu fáa eitt ískoyti úr hesum sama grunni, og tað ískoytið hava vit ikki neyv tøl fyri, men tað kann liggja í millum 2-4 mió.kr., siga vit 4 mió.kr. so eru vit uppi á 36 mió.kr. so eru tað 11 mió.kr. eftir. Tað er m.a. tað, at hetta lánið er bíligt, og treytirnar fyri at fáa tað eru, at tú er yvir 18 ár, so vænta vit, at tær 25 mió.kr., sun nevndar eru í lógini eru treytaðar, av, at fólk taka somu lán, tey hava tikið higartil, at lántøkan verður munandi størri so vit hava lagt upp fyri soleiðis, at hetta letur seg gera og umframt tað, hava vit lagt upp fyri til útbúgvingar, sum eru uttanfyri Føroyar. Alt hetta ger, at vit vænta, at upphæddin fer at røkka, og skuldi tað ent, at nakað leypur av, so fer tað í ein grunn soleiðis, at útbúgvingargrunnurin sum so kemur at vaksa og kann hava meir at standa í móti við. Tað kann bara merkja, at vit seta minni av tey komandi árini.

Tað var Signar Hansen, hann hevur spurt um nakað tað sama sum hinir. Tað er kanska at svara upp í saman ti tað er eingin grund til at taka upp í saman, og tað er heldur ikki undarligt, at menn spyrja upp í saman, tá teir eru uppi, men eg haldi meg hava svarað upp á tað mesta. Viðvíkjandi um itingini av hesum, so er ætlanin, at hon verður løgd inn á skúlafyrisitingina. Hvat vit gera við tað, sum reglugerð og kunngerð viðvíkur, kann eg siga, at vit hava alt summarið frá várinum arbeitt við at gera kunngerðir og reglugerðir klárar og vænta, um tingið skjótt samtykkir hetta uppskotið so vænta og vóna vit, at kunna útgjalda studningin síðst í hesum mánaðinum ella fyrst í næsta mánað soleiðis, at næmingarnir fáa tann studning, sum teir hava stórt brúk fyri,

tí skúlagongdin er byrjað, bókakeyp er framt av teimum, og tí vilja vit ynskja, at málið fær so skjóta viðgerð í tinginum sum gjørligt, so skulu vit royna at fáa studningin út sum skjótast. Takk fyri.

Signar Hansen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er viðvíkjandi hesi reglugerðini, sum vit eru inni á. Tað er rætt, sum landsstýrismaðurin sigur, at landsstyrið hevur arbeitt og gjørt eina reglugerð, tað vil siga, landsstýrið hevur í hesum føri, verið við til at skapt eina reglugerð. Men tá ið nú hesin stuðulsstovnurin er valdur, so kann hon til eina og hvørja tíð taka og gera eina nýggja reglugerð uttan at spyrja landsstýrið eftir. Tað var tí eg helt, at tað var rættari at tað stóð eisini, at um stuðulsstovnurin ger eina reglugerð, so verður reglugerðin at leggja fyri landsstýrið. So verður hon góðkend av landsstýrinum eisini, so tað ikki verður alt ov lætt at broyta reglugerðina, tað var tað sum eg hugsaði um.

Jógvan Durhuus (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var rætt, sum Signar Hansen segði, eg kanska svaraði ikki nóg neyvt. Men eg eri samdur við honum, at tað er rættari at hava tað fyrivarni og tí vil eg mæla til, at nevndin tekur tað við, sum hon heldur verða neyðugt, soleiðis at tað ikki ber til at broyta.

Eilif Samuelsen (sb.) viðmerking

Tað var fyri so vítt eitt, sum eg gloymdi at siga undir fyrra umfarinum, tað var tað, at her stendur, at tey sum eru undir 18 ár kunnu fáa stuðul eisini, og tað eru næmingar í 10. flokki.

Eg meini principielt, at tað er skeivt at næmingar í fólkaskúlanum skulu fáa studning frá tí almenna, tí í fólkaskúlanum eru tey fyri tað fyrsta undir 18 ár, og tá hava foreldrini ábyrgdina av teimum, tað eiga tey eisini at hava, og tað at tey fáa alt frítt. Tey fáa fria

skúlagongd, tey fáa fría koyring líka mikið, hvar tey eru, og kunnu tey ikki búgva heima, so kunnu tey sambært skúlalógina fáa goldið uppihald á tí staðnum, t.d. tey sum koma frá útoyggjum og eru noydd at búgva í onkri aðrari bygd kunnu fáa pengar haðani til at gjalda uppihaldið. Tí meini eg, at tað er skeivt, at tey, sum ganga í fólkaskúlanum, skulu fáa studning, og eg meini, at vit skulu brúka kjansin nú til at avtaka tað.

Formaðurin

So eru tað ikki fleiri sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað. Tingmál nr. 13 verður beint til viðgerðar í mentunnar-og skúlanevndini.

Síðan kemur til viðgerðar, 1. viðgerð av tingmáli nr. 19, tað er keyp av ognum til landsfyrisitingina.

Jørgen Thomsen (jv.)

Harra formaður.

Tað er uppskot um at keypa eini hús í Havn til landsfyrisitingina. Tað hevur verið nakað av práti um hetta húsið frammanundan og tað hevur eisini verið frammi í fjølmiðlunum, onkur var frammi og segði, hvussu fegin tey vóru um alt hetta. Tað er nú komið so langt, at nú liggur málið her á tingbori, og tað haldi eg fyri so vítt verða rætt. Málið verður beint í fíggjarnevndina, og eg kann siga beinanvegin, at har skulu vit geva tí eina góða og sakliga viðgerð.

Eg má siga, at vit hava ikki viðgjørt málið í flokkinum, so eg fái ikki givið tinginum nakra ábending, um hvørja støðu Javnaðarflokkurin kemur at taka til hetta uppskotið. Um tað er dýrt ella bíligt tað veit eg ikki, men vit vilja so geva hesum eina góða og sakliga viðgerð í fíggjarnevndini. Takk fyri.

Formaðurin

Tað vóru ikki fleiri sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað, málið verður beint í fíggjarnevndina.

Síðan kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 18: Bygging av hølum til Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetur Føroya. Hvør biður um orðið?

Jóannes Dalsgaard (jv.)

Harra formaður.

Tað er 1. viðgerð av máli nr. 18/1988: Bygging av hølum til fiskirannsóknarstovu og fróðskaparsetur. Hevur man sagt a, so má man eisini siga b, tað er gamalt. Hetta er eitt uppskot um, at landsstýrisð skal kunna læna 11 mió.kr. til húsið, sum er farið í gongd, og nú skulu teir kvadratmetrar, sum eru í yvirskoti, nýtast til Fróðskaparsetur Føroya.

Tað kann Javnaðarflokkurin taka undir við, tí Fróðskaparsetur Føroya hevur heilt ómetaliga vánaligar hølísumstøður. Tað er soleiðis í løtini, at undirvísingin kann ikki byrja til tíðina, tí tey bæði undirvísingarhølini, vit hava bara havt tvey, eru nú tikin til skrivstovur m.a. til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Sum altíð, so hevur alt tað, sum hevur við náttúruvísindaútflutningin prioritet fram um so nógv annað. So tað er gott, at Fróðskaparsetrið fær betri hølir, sjálvt um hesi hølini ikki verða tøk enn, so má man klára seg í fyribils hølum. Tað var ikki tað, sum eg vildi siga.

Tað, sum eg vil minna á, er, at vit mugu ansa eftir, at tað, at fróðskaparsetrið fær hesar kvadratmetrarnar, má ikki forða fyri eini loysn av teimum samlaðu hølistrupulleikunum, tað vil siga, at tað má ikki føra til, at vit ikki byggja eitt nýtt fróðskaparsetur soleiðis, sum ætlanin er, og soleiðis sum Tórshavnar býráð við stórari vælvild hevur umhugsað at leggja lendi til uppi í Marknagili. Tí um fróðskaparsetrið skal verða tað, vit fegin vilja, Føroya lærdi háskúli, so mugu vit skapa hesum stovni tær neyturviligu fysisku rammurnar, sum í dag eru heilt ómetaliga vánaligar. Tað gera vit bara við at byggja eitt universitet, vit mugu fara út um Havnína niðan í Marknagil ella út í Havnadal ella hvar vit fara, vit kunnu ikki halda fram við at kroysta stovnar niður úti á Debesartrøð, har er fult.

Tað er sjálvandi lætt at verða klókur aftaná, men tá ið hetta málið fyrstu fer var í tinginum, vísti eg á, at tað var skeivt stað, vit løgdu fiskirannsóknarstovu-

na. Nú skulu tveir stórir stovnar kroystast niður har aftrat, og tað kemur at skapa kolosalar trupulleikar fyri ferðsluna fyri tey, sum búgva har úti og fyri tey, sum arbeiða har. Hetta var bara fyri, at tað ikki skuldi verða gloymt og fara aftur við borðinum soleiðis, at landsstýrið og vist nokk løgmaður, sum leggur hetta fram, ikki skulu gloyma, at tað yvirordnaða máli, at vit fáa bygt eitt fróðskaparsetur, verður bara ein neyðloysn, hetta hjálpir bara upp á teir allar mest akuttu trupulleikarnar. Um 3-4 ár, so er tað líka galið. Út frá hesum taka vit undir við málinum og mæla til, at tað far viðgerð í fíggjarnevndini.

Olaf Olsen (ff.)

Harra formaður.

Nú er nál aftur á tingborið um fiskirannsóknarstovu. Tað hevur tað verið fyrr, og eg taki undir við, at tað verður bygt, men sum so mangt annað, hon dýrkar í hvørjum, hvørja fer hon kemur aftur. Um eg kann við formansins loyvi sitera burtur úr skjølunum, sum fylgja við, so siggja vit, at fiskirannsóknarstovan og Vaktar- og Bjargingartænastan vóru mett at kosta 20 mió.kr. í oktober í 1986, 26 mió.kr. í juni 1987, 1 ár seinni, tá er tað ikki Vaktar-og Bjargingartænastan, men sjómansskúlin, sum er komin upp í aftur, og tá er tað 34 mió.kr., so aftur nú trýkvart ár seinni er tað ikki sjómansskúli, men nú er tað fróðskaparsetur, og nú er tað vorðið til 27,3 mió.kr. við reguleringum roknað við at verða 40 mió.kr., so tað glíður alla tíðina longur og longur.

Nú segði Jóannes Dalsgaard, at tá íð man hevði sagt a, so varð man eisini noyddur at siga b. Nú segði man a og b fyrst, og so hevur man sagt d, og nú siga við e, so nú er spurningurin, um vit fara at halda longur fram í alfabetinum og kanska droppa fróðskaparsetrið eisini, tað sær út sum um, at tað er eitt skiftandi navn aftan fyri hesa skástrikuna til fiskirannsóknarstovuna, og tað gongur seint at koma víðari við henni. Men tað, sum verður hongt upp í, sær út sum, tað verður dýrari og dýrari fyri hvørja ferð, og nú hoyra vit frá Jóannesi

Dalsgaard, at hetta er bara smáting, hetta hevur einki við fróðskaparsetrið at gera, hetta er ein neyðloysn. Eg haldi, at so skuldi man konsentrera seg um at fingið gjørt fiskirannsóknarstovuna og fingið hana upp at standa, og lata so tað, sum stóð aftan fyri skrástrikuna bíða, tí tað sær út sum, at tað ger bara tað, at tað dregur meir og meir út og ger tað dýrari og dýrari. Sjómansskúlin, tað er so eitt, hvar hendir við honum, men Vaktar-og bjargingartænastan, hví hon er slept, og hvat er hent við henni, tað hoyrdist einki aftur hvat hendi við henni. Tað var einaferð talan um at flyta hana til Klaksvíkar, eg kann ikki minnast, at tað er nøkur samtykt um tað, men kanska eg minnist ov stutt, men hon, haldi eg, treingir eisini til onnur hølir so tað er ikki bara fróðskaparsetrið, sum treingir til tað, um tað er so, at man skal gera alt tað sum ynskir at gera, og so koma vit aftur til tað, hvussu vit prioritera.

Eg haldi, at vaktartænastan er ikki væl fyri. Vit siggja, at tølini verða størri og størri. Sum sagt eru tey komin á 40 mió.kr. nú. Vit siggja, at projektering og eftirlit kosta yvir 5 mió.kr., eg haldi, at tað er eitt ótrúliga stórt tal, og av ringum royndum veit eg, at tað hevur altíð hug at glíða uppeftir og ikki minst tað talið. Við siggja, at her er ein postur, sum eitur listaverk, hann er 500.000 kr., tað havi eg ikki sæð fyrr á nøkrum projekti, men tað er møguligt, at eg heldur ikki havi hugt nóg væl eftir, Eg siggi, at málaraarbeiðið kostar 650.000 kr. og restin av málingini kostar 500.000 kr., so tað er umleið sama støddd. Tað er kanska slíkt, sum skal til eisini, tað skal eg lata verða ósagt, at tað ikki hoyrir við, men eg vil eisini taka undir við, at vit fáa bygt fiskirannsóknarstovuna, og at tað, sum sagt hongur uppi í har. Tað er spurningurin, um vit skulu taka tað við nú, man skuldi kanska fingið avgreitt tað málið og so latið hitt ikki verið aftan fyri eina skrástriku, men verið eitt mál fyri seg.

<u>Eilif Samuelsen</u> (sb.)

Harra formaður.

Tunt er tað blóð, sum ikki er tjykrí enn vatn.

Hetta uppskotið um at byggja fiskirannsóknarstovu er jú eitt barn av undanfarnu samgongu og landsstýri, men sum frá lýður, er tað barnið næstan ikki til at kenna aftur, tað hevur broytt útsjónd og prísurin fyri tað er eisini broyttur ómetaliga nógv, men tað er verðins gongd.

Nú er fróðskaparsetrið komið upp í í staðin fyri Vaktar-og bjargingartænastuna, sum var tá, tað var merkt, at vaktar og bjargingartænastan hevði akuttan tørv fyri at byggja, men síðan tað varð tosað so nógv um decentralisering, og at Vaktar-og bjargingartænastan skuldi fara norður til Klaksvíkar, so visir tann spurningurin seg at verða loystur, sjálvt um also einki hendir. Nú er so fróðskaparsetrið komið upp í, og sum tað hevur verið sagt frammanundan, so hevur fróðskaparsetrið nógv brúk fyri at fáa hølir aftrat, og tað kann so hjálpa upp á tann akutta tørvin har. Eg vil taka undir við Jóannesi Dalsgaard, at vit eiga ikki at lata endaligu loysnina á fróðskaparsetrinum fara úr eygsjón, at vit fáa bygt eini virðilig hús til fróðskaparsetrið á einum hóskiligum stað eisini.

Nú nevndi Olaf Olsen hetta um listaverkini, og tað er sjálvandi eitt av teimum, sum man kann undrast yvir í hesum yvirlitinum, sum nú fylgir við, men vit hava sæð á einum øðrum stovni, sum stutt síðan er tikið í brúk her í Havn, nevnliga á røktarheiminum Lágargarði, har er nevnliga beinanveg latin ein upphædd til listaverk, og má man siga, at tað er til ómetaliga stórt gagn og gleði, íð hvussu so er fyri eyga, at tað er gjørt. Nógva aðra staðir, er tað soleiðis, at tað er lógásett við almennar bygningar, at har skal eín ávísur prosentpartur fara til pynting av hesum, men so langt er tað nokk ikki komið her hjá okkum, men at tað er ein rímilig upphædd til tað, tað er fyri sovitt einki í vegin við tí.

Sambandsflokkurin vil við vælvild viðgera hetta málið í fíggjarnevndini. Nú er hetta komið nakað á leið, og tað má, íð hvussu so er, ikki verða soleiðis, at hetta arbeiðið kemur at steðga upp vegna peningatrot tí so vita vit bara tað, at so skulu vit taka støðu til eina nýggja játtan, tað skulu vit nokk kortini, tá íð hetta er liðugt.

Løgmaður

Harra formaður.

Eg skal takka fyri viðgerðina og undirtøkuna, sum tykist at vera einmælt til fiskirannsóknarstovuna, ið hvussu so er. Onkur hevur mælt til, at slept fróðskaparsetrinum. Til tað vil eg siga, at so verður rættiliga galið við onkrum øðrum stovni, eitt nú Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Tað er eingin loyna, at løgtingið í gjøgnum fleiri ár hevur álagt Heilsufrøðiligu starvsstovuni fleiri og fleiri uppgávur, eins og løgtingið hevur samtykt fleiri og fleiri útbúgvingar undir fróðskaparsetrinum soleiðis, at hølisviðurskiftini eru heilt út av lagi vánalig, og tí hava verið nógvar ætlanir frammi um at keypa bygningar og innrætta bygningar eitt nú uppi á Hálsi fyri 25 upp í 40 mió.kr. stk. So tá ið man valdi hesa loysnina við fróðskaparsetrinum, so kom tað av, at man har við slapp undan at flyta Heilsufrøðiligu starvsstovuna, sum frammanundan hevur rættiliga dýrar innrættingar, sum eru framdar í teimum bygningum, teir húsast í nú, soleiðis, at man metir, at tá skjalasavnið einaferð verður bygt og Heilsufrøðiliga starvsstovan kann hava allan tann bygningin, so slepst undan at byggja aðra staðir.

Viðvíkjandi vøkstrinum av projektinum við 400 kvadratmetrum kann eg bara siga, at eg ikki minni enn tvær ferðir bæði í fjør og í ár havi boðað fíggjarnevndini frá, verið í fíggjarnevndini og greitt frá, at hetta bleiv gjørt, men eg má viðurkenna, at lógaruppskot hesum viðvíkjandi kanska kemur fram í so seint, men endalig tilboðsgeving og annað tílíkt er ikki liðugt fyrr enn nú. Eg meti sjálvur, at tað var rætt at økja bygningin, fyri tað fyrsta er hann munandi vakrari aftaná, hann var ikki serliga væl proportioneraður frammanundan haldi eg. Tá ið tann eini vinkulin var so stuttur í mun til restina, so hevur man eisini valt. Tað ger tað nokk nakað dýrari at varðveita grólaðingína og flaðtakið, man kundi kanska sloppið einar 2 mió.kr. bíligari bara, um man gjørdi ein betongbygning við eini vanligari tekju.

Tað er eisini rætt, at projektering og eftirlit er vorðið ógvuliga dýrt. Tað er kortini ikki so nógv at gera við tað í hesum projektinum, hetta er sáttmála-

bundið, men eg kann siga frá , at síðan landsstýrið fekk ein arkitekt settan, hevur man gjøgnumgingið tey projektini, sum standa fyri at fara í gerð eitt nú á skúla-og sjúkrahúsøkinum.

Bert á sjúkrahúsøkinum aftan á samráðingarnar millum byggidirektoratið, hvar man hevur fingið teirra rætningslinjur og teir projekteringsstovnarnar og verkfrøðingar og arkitektar, hevur man fingið kostnaðin av hesum byggingum fleiri milliónir niður. Tað vil siga, at prosentini, sum teir hava loyvi til at taka ella fáa loyvi til at taka í samband við almennum byggingum framyvir, eru lækkað, men dýrkingin annars stendst væl av tí nógva virkseni, sum er í samfelagnum.

Eg var til staðar nú, tá ein stovnur varð handaður, so vítt eg dugdi at rokna út, kom kvadratmeturin upp á 22.000 kr. Her er so nakað nógvir kvadratmetrar fyri 18.000 kr. og nakrir fyri 11.000 kr., tað er dýrt, man átti at miðað í móti at framt byggingar, sum kundu fingist fyri 12.000 kr. fyri kvadratmeturin, men tað hevur vist seg at verið torført.

Spurt verður eftir, hvat er vorðið av Vaktar-og bjargingartænastuni, síðan ætlanin um at hýsa henni har er slept, og menn vita væl, at hon eisini húsast undir trongum umstøðum. Tað er nú ikki tann stóri stovnurin, og tað er ikki tann stóra decentraliseringin heldur í at flyta hann út, tey eru 3½ fólk, restin býr runt um í landinum. Tað, sum Vaktar-og bjargingartænastan hevur brúk fyri, er fyrst og fremst goymsluhølir, og tað eru framvegis ætlanir um decentralisering í sambandi við henda stovnin eitt nú við bjargingartænastu og katastrofuhjálparstovnum runt um í landinum, so hvørt, sum tann stovnurin verður útbygdur, fer eisini at fara ein decentralisering fram.

Tað er eingin endaliga støða tikin til, hvar hesin stovnurin skuldi ligði. Tað er ikki beint, at tað er tikin støða til at flyta hann til Klaksvíkar, tað er heldur ikki tikin støða til at flyta hann til annað høli, men tann bygningin, sum stendur inni á Hulki, hevur landsstýrið fingið í boði at leiga til ávís endamál, eitt nú Fiskirannsóknarstovuna, Vaktar-og bjargingartænastuna

og aðrar stovnar, sum kundu havt tørv á goymslurúmum, men um tað er ein loysn at flyta stovnin allan, sum hann er, inn hagar, skal eg ikki siga, í dag.

Eg noyðist at viðmæla, at hetta projektið soleiðis, sum tað nú er. Ein amputatión av parti av honum ella ein útseting vil bara gera tað upp aftur dýrarí. Teir, sum hava við byggingina at gera, garantera nú, at nú hava teir lagt so nógv upp fyri, tað kemur also ikki aftur um aftur. Eg kann ikki leggja høvdið á blokkin fyri, at so verður men eg vóni, at teir hava rætt og byggingin er sum sagt so væl í gongd, at tað skuldi verið ein møguleiki fyri at fingíð tað liðugt. Sæð í ljósinum av hesum sum sagt, at man sleppur undan at byggja til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, so haldi eg ikki, at tað er so galið kortini og vil heita á tingið um at samtykkja hetta uppskotíð.

Jóannes Dalsgaard (jv.)

Harra formaður.

Bara fyri at tað skal verða heilt greitt eisini fyri teimum, sum halda, at man skal skerja hetta, at tað sindrið, sum fróðskaparsetrið hevur, hevur man nú skert við at láta ein part til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, fyri at hon kann lúka allar uppgávurnar, sum løgtingið leggur á hana. Tá er klárt, at tá er tað okkara skylda ella myndúleikans skylda at geva setrinum eina hóskandi kompensasión fyri tað, og tað fær setrið við hesum eyka kvadratmetrunum, sum verða til yvurs á Fiskirannsóknarstovuni, tað er heilt í lagi, og tað vóni eg, at allir taka undir við eisini Olaf Olsen, tí ella brýtur undirvísingin á setrinum saman. Harfyri skulu vit ikki missa úr eygsjón, at vit skulu byggja eitt nýtt setur einaferð. Men í løtini er einki byggilendi tøkt, tað er eitt í einum heilt nýggjum býarplani, so tað fara at ganga nógv ár, tað kann eg troysta ávísar menn inni her við, so tey kunnu ekkleys samtykkja hetta.

Formaðurin

Tað eru ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað, og málið verður beint í fíggjarnevndina.

Síðan kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 22, býti av rakstraravlopi landskassans fyri fíggjarárið 1987. Hvør biður um orðið?

Løgmaður fær fyrst eina stutta rættleiðing í hesum máli.

Løgmaður

Tað er ikki fyri hetta málið, tað er fyri eitt mál, sum fór í nevnd uttan viðgerð, tað er uppskotið um studning til fiskivinnuna 100 mió.kr. Har er mælt til, at alt verður tikið av yvirskotinum hjá landskassanum, men landsstýrið vil fegin taka tað aftur og mæla til, at hesar 40 mió.kr. sum standa á hesum uppskotinum, verða tiknar av avlopinum í 87, og at restin verður játtað á annan hátt.

Jógvan Sundstein (ff.) viðmerking

Harra formaður,

Tað var bara ein viðmerking til hetta uppskotið og tað, sum løgmaður segði, at í hinum uppskotinum, sum er farið í fíggjarnevndina, stendur, at 100 mió.kr. skulu takast av rakstrinum 1987, og tað er eftir øllum at døma pláss til tað. Nú sigur løgmaður, at bara 40 mió.kr. skulu takast av 87 og restin á annan hátt, tað fingu vit ikki at vita nærri hvat annar háttur er, men um tað er hugsanin, at tað skal takast av 1988, so rokni eg við, at tað verður bara ein hækking av einum halli fyri 1988, sum kemur at gera seg galdandi.

Formaðurin

Tað eru ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er enda.

Tað er einki uppskot um nevnd.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

Síðani er tað 1. viðgerð av tingmáli nr. 21: Einvís føroysk avmarking í toskaveiðuni í Barentshavinum. Tað stendur á umslagnum, at málið er býtt út 31. august í 1988, og nú verður upplýst, at tað manglaði helvtin av eintøkunum, tað er tingmál nr. 21. Málið verður viðgjørt á seinni fundi. Tingmál nr. 21: Einvís føroysk avmarking í toskaveiðuni í Barentshavinum var ikki útbýtt til allar tingmenn á hesum fundi, men nú er upplýst, at allir tingmenn hava fingið hetta mál. Um so er, at eingin mælir ímóti, so verður farið undir 1. viðgerð av hesum máli. So er tað samtykt.

1. viðgerð av tingmáli nr. 21, hvør biður um orðið?

Olaf Olsen (ff)

Harra formaður.

Hetta er eitt nokk so óvanligt mál. Eg veit ikki, um tað er hent fyrr, at aftan á at hava samráðst til eina ávísa kvotu, eitt ávíst tonsatal, so verður tað mítt í árinum tikið upp aftur og roynt at avmarka tað. Grundin til, at tað er avmarkað er, at nú var útlitið so vánaligt fyri stovnin, at teir halda ikki, at teir kunnu koyra árið út við teimum kvotum, sum eru.

So stendur her við formansins loyvi í viðmerkingunum á næstu síðu, at útlitini eru verri, sæst eisini av tí vanliga fiskiskapinum (onkur tosar í salinum) ná, so gevur tað meining, ja, (onkur tosar í salinum) eg tók tað, sum tað var fiskiskapurin, ikki royndarfiskiskapurin, men o.k. Tað sæst av tí vánaliga fiskiskapinum eystanfyri í ár, men tað vísir seg so mangan, at tað er fiskiskapurin og ikki tær metingar, sum verða gjørdar, sum er tað, sum er til at fara eftir Tí at tað, sum vit hava hoyrt um frammanundan, tað er jú tað, at tað hevur verið so óvanliga nógvur yngul til eystanfyri, at nú fór at verða eitt ógvuliga gott fiskarí, so tað var eingin vandí fyri, at har fór at standa væl til, men nú vísir

tað seg beint mótsatt, at nú er als ikki so nógvur fiskur til. So verður tað, sum tað stendur her, eisini fiskað nógv minni, so spurningurin er, hví tað so endiliga skal skerast niður í kvotuni, um tað so ikki man fara at gera vart við seg sjálvt.

Eg haldi, at tað er ið hvussu so er ein keðiligur trafikkur at koma innå, at man skal broyta tað í einum ári. Eg trúgvi ikki, at tað veltir stovninum fyri tað, um kvotan verður avmarkað nú soleiðis, at tað kanska verður fiskað minni, av tí at kvotan verður niðursett. Tað kundi hent, at júst av tí vánaliga fiskiskapinum, varð minni fiskað kortini, og tað hevði ikki verði meira enn tað sama.

Tað er tað, sum tað kundi talað fyri, men her er so ikki ein tilsvarandi niðurseting í okkara sjógvi, tí at man helst heldur ikki hevur nøkur tøl fyri, at skuldi verið verri her, so vil man ikki seta niður. Tað kann eg taka undir við, at fyri tað um aðrir seta niður, so eiga vit ikki at gera tað tilsvarandi í okkara sjógví, men so um tað vísir seg eina aðra ferð, at tað eru kanska slík viðurskiftir í føroyskum sjógvi, sum gera seg galdandi sum her í Barentshavinum, so eigur man at taka tað uppaftur.

Annars trúgvi eg, at hetta er ikki heppið at koma inn á at broyta eina kvotu í árinum, tí eg trúgvi, at tað hevur tað ov lítla ávirkan til, tí, sum tað stendur her, at tann vánaligi fiskiskapurin mann fara at vísa seg í tí, so skuldi tað verið tíðs nokk at gjørt tað til næsta ár. Men eg vil taka undir við málinum hóast tað.

Hilmar Kass (sj)

Harra formaður.

Eg kann taka undir við tí óvanliga, ið Olaf Olsen vísti á her, at vit í einum ári broyta tann sáttmála, sum gjørdur er fyri samlaða árið.

Har hevur tað serliga verið Noregi, ella tað hevur bara verið Noregi, sum hevur strongt á, meðan vit ikki

hava frætt nakað frá russum um hesar trupulleikar.

Hetta var eitt vónbrot at hoyra frá norskum myndugleikum, at nú skuldi standa so illa til við fiskiskapinum har, at teir ikki bara bóðu hampiliga, men hava ógvuliga harðliga strongt á, at tað verður gjørdur ein niðurskurður mitt í árinum. Eg meini, tað er rætt soleiðis, sum landsstýrið hevur gjørt her út frá eini so harðari ákoyring og ynski frá norsku myndugleikunum um, at vit skera okkara veiðu niður í ár, so hevði tað uttan iva fingið avleiðingar fyri samráðingar fram í tíðina, um vit noktaðu heilt at verða við í hesum. Tað stóra vónbrotið í hesum er tað, at frammanundan hevur verið sagt, at tað vóru bestu útlit fyrí einum støðugt vaksandi fiskastovni í nøkur ár.

Eg meini, tað er rætt soleiðis, sum tað her er gjørt, at tað verður ikki broytt á okkara avgerð, við øðrum orðum vil ásanna, at vit ikki leypa frá teimum avgerðum og avtalum, vit hava gjørt við norðmenn og fyri alt tað við russar eisini hetta her árið, hóast hetta ringa útlit. Eg má siga, at eg eri eitt sindur bilsin, tá ið eg hugsi um tær upphæddir, tað snýr seg um her hjá føroyingum, at norðmenn skulu leggja so stóran dent á at broyta eina gjørda avtalu mitt í árinum. Tí soleiðis sum Olaf Olsen nevndi tað, so eru fiskimøguleikarnir so mikið smáir, at tað er ivasamt, um tað broytir nakað sum helst úrslitið fyri okkum føroyingar, um vit avmarka okkum soleiðis, sum her er skotið upp, ella vit fiskaðu sum frægast tað, sum eftir er av árinum. Men út frá tí greiða ynski frá norðmonnum at skera nakað niður, er hetta uppskotið lagt fram, og eg kann taka undir við, at vit boyggja okkum, sjálvt um tað tykist órímiligt, og eg taki eisini undir við, at málið verður viðgjørt í marknaðarnevndini.

Henrik Old (jv)

Harra formaður.

Í Javnaðarflokkinum taka vit undir við hesum her, sjálvt um hetta var ein kediligur útviklingur á hesum

økinum, tí at tað sá jú gott út í fjør, í fyrrári og í vetur, ikki minst hjá teimum, sum fiskaðu har yviri í vetur, men at støðan er álvarsliga broytt, tað sigur tann føroyski fiskiskapurin har yviri. Eg haldi, man nýtist ikki longur at siggja, hvussu gongdin hevur verið uttan, man hyggur at tí, sum tey føroysku skipini hava fingið. Tey eru alt árið har, og teir menninir hava verið har í nógv, nógv ár, so tað er ein rættiliga góð meting av, hvussu ið støðan hjá fiskivinnuni er.

Ein kundi kanska hildið, at hetta var í so smáligt at trivið í nú móti endanum av einum ári, men man skilir kortini teirra sjónarmið, tí teir hava allar helst stórar innanhýsis trupulleikar av sínum egnu. Tí er tað soleiðis sæð skiljandi, at teir eru nærmast píska ðir til at taka okkum við. Hyggur man í tey bløðini, sum hava við fiskarí at gera, Fiskaren og onnur, so er tað dagligur kostur, at virkír serliga har norðuri á leiðini fara á heysin, og tað er vorðið so akut, at summir siga, at teir hava ongantíð upplivað tílíkt fyrr, sum teimum hevur verið fyri nú har norðuri.

Vit mugu bara siga tað, at tað gjørdist ikki við, soleiðis er tað nú einaferð, tá man fæst við fiskarí, tað gongur væl, og so mitt í tí heila so er einki at fáa. Man hevur hoyrt menn, sum hava fiskað har yviri, og um man hugsar eitt sindur aftur, so vísti tað seg eisini, tann tíð tað var, tá ið fiskaríið fór at minka í Grønlandi, so fóru bátar at sigla eystureftir og nú vísir tað seg, at tað øvugta er aftur við at taka seg upp. So má man bara vóna, at tað fer at laga seg soleíðis, at vit kunnu fara at sigla vestureftir í staðin fyri, at vit hava siglt eystureftir nú hesi áríni, og at vit allir inni her kunnu leggja allar árar út, fyri at vit kunnu fáa sum frægast við at fara vestureftir.

Restina við hesum prosentunum mugu vít bara píska okkum til at liva við og vóna, at tað kemur tann dagur, tá ið tað fer at ganga hín vegin aftur, tí at tað hevur tað gjørt, so tað nýtist ikki heilt at sleppa endanum, um hetta verður eitt ár ella tvey.

Vit taka undir við, at hetta verður gjørt upp á tann lagaligasta mátan. Takk fyri.

Jógvan I. Olsen (sb)

Harra formaður.

Tað var Olaf Olsen, æraði tinglimur, sum nevndi, at tað var eitt óvanligt mál, og tað hugsi eg, tað er. Eg veit ongantíð um, at man fyrr hevur viðgjørt mál, sum vendir hendavegin.

Nú kann eg minnast, tað var í fyrstuni, tá ið henda samgongan var skipað, og fiskurin í Barentshavinum, stovnurin har, var væl fyri, og samráðingarmenninir komu heim aftur við góðum úrsliti, at fjølmiðlarnir, sum umboða hesar her samráðingarmenninar, lótu óføra væl at, at tað var samráðingarmonnunum at takka, at man hevði fingið so góð úrslit. Eg minnist, eg haldi eg segði tað einaferð her, at tað kundi ljóða næstan sum um, at hesir menninir høvdu verið har yviri og gitt sjálvir, fingið stovnin á tann hátt. Men tað er sjálvandi gott at hava góðar samráðingarmenn, men óansæð, hvørjir teir eru, so er tað altíð avgerandi út frá hvørjum støði, man kann samráðast, og í hvørjum standí fiskastovnarnir eru, tað er ein veruleiki.

Nú er hesin stovnurin, sum tá sá út til av verða stórur og sum hevur verið nokkso stórur, tíverri farin nógv aftur, og tað er sum so oftani, at havið letur seg ikki rokna út upp á kg, tað hevur sínar vegir, sum vit ikki kanska tíbetur ikki altíð kunnu rokna so væl út, men har fyri skulu vit ikki gevast við at rokna út, vit skulu altíð rokna út og korrigera tað alla tíðina.

Tað er ein veruleiki, at nú er stovnurin illa fyri, og tá ið norðmenninir ganga so hart inn fyri hesum at fáa kvotuna skorna niður, so vil eg eisini taka undir við hesum málinum, tí eg haldi, tað er rætt upp á longrí sikt, at vit gera hetta her. Mín metan er, at sjálvt um vit gera hetta her, so verður tað, sum vit fiska í netto ikki stórt øðrvísi kanska helst tað sama. Tá ið vit skulu í framtíðini tosa við norðmenninar um fiskiskap

í komandi árum, tá haldi eg, tað er eitt fyrimunur at gingið teimum á møti hesuferð. So eg haldi, tað talar fyri, at vit skulu gera hetta her, og eg taki undir, tá ið málið fær viðgerð í marknaðarnevndini, har vil okkara umboð viðgera tað við vælvild. Takk fyri.

Løgmaður

Harra formaður.

Eg skal takka fyri undirtøkuna, sum málið hevur fingið, og eg skal geva Olaſi Olsen rætt í tí, at hetta var helst óneyðugt at gera, og í og fyri seg bæði fyri norðmenn og fyri føroyingar, tí tann veruligi fiskiskapurin kemur helst at verða minst 22% minni enn tað, sum man kundi fingið, um man hevði troytt alt.

Tað tykjast vera psykologiskar grundir, sum liggja aftan fyri hetta her, ógvuliga sterkar psykologiskar grundir, og eg má heldur siga tinginum frá, at norðmenn eru als ikki nøgdir við 1760 tons, men vilja fegnir sjálvir heilt og fult avgera, hvussu avmarkingarnar skulu fremjast, um teir ikki líta á, at russar fara at skarva av á sínum øki ella krevja okkum at avmarka á sínum øki, tað skal eg ikki kunna siga, men tað norska kravið gongur reelt út upp á ein niðurskurð upp á millum 2.000 og 2.100 tons.

Hin vegin sæð so haldi eg, tá ið vit skulu gera tað upp á henda einvísa mátan, so tað er kanska heldur ikki psykologiskt heilt beint í Noregi, tí sjálvsagt hava teir eisini sínar trupulleikar og "gnidningar" millum veiðimenn norðanífrá og sunnanífrá, og teir har norðuri høvdu kanska svølt niðurskurðinum, um teir har suðuri eisini høvdu merkt tað upp á sín kropp við minni svartkjafti, men vit hildu, tað var ósakligt, tí gjørdu vit á henda hátt. Vit meina eisini, at vit skulu hava rætt til at demonstrera, at vit fremja niðurskurðin á ein hátt, sum vit meta er gagnligur fyri stovnin, sum tað snýr seg um, ikki akkurát at verða beittur her og har av einum samráðingarpartnara, sum á óvanligan hátt

toskakrígg millum Føroyar og Noreg.

Formaðurin

So vóru ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað, og tingmálið verður beint til viðgerðar í marknaðarnevndini.

Síðani kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 2, løgtingslóg um serviðbót til ávísar pensionistar.

Agnar Nielsen (sb)

Harra formaður.

Nú, ið valskeiðið fer at verða lokið, fingu vit endiliga eitt uppskot um serviðbót til ávísar pensionistar.

Tað hevur fleiri ferðir verið ávíst her í samgonguni, at tørvur hevur verið á at gera broytingar í fólkapensiónsskipanini hjá okkum her heima í Føroyum. Tí við hesi lóg eins og við fleiri øðrum lógum er tað tað soleiðis, at um hon er hóskandi í tí danska samfelagnum, so er tað ikki harvið sagt, at hon eisini er hóskandi í tí føroyska samfelagnum, og hóast tað, at henda samgongan ikki tordi at taka almannamál við í blokkstuðulsskipanina, so eigur tað ikki at hindra Føroya løgtingi at bøta um og broyta umstøðurnar hjá okkara pensionistum, sum er betur fyri tað føroyska samfelagið eisini.

Við galdandi skipan er tann regla galdandi, at um ein fólkapensionistur hevur cina munandi arbeiðsinntøku afturat, ja, so missir hann burtur av pensiónini. Tað eru hesi viðurskifti, sum hava ført við sær, at nógvir fólkapensionistar hava kent á sær, at tað loysir seg illa at arbeiða, tá teir umframt at rinda vanligan inntøkuskatt, sum er nóg tungur at bera, eisini skulu missa burtur av pensiónini.

Sum eg nevndi, so hevur fleiri ferðir verið roynt í hesum valskeiðnum at bøtt um hetta, og Sambandsflokkurin hevur eisini havt uppskot frammi meira enn eina ferð um hetta her. Tá varð ført fram, at Sambandsflokk-

urin hevur ta áskoðan, at øll tey, sum halda seg orka, eiga at fáa møguleika fyri at arbeiða, eisini tey gomlu, tí at arbeiða má vera tann besta heilsubótin. Tað er ivaleyst so, at tey flestu ynskja at sleppa at halda fram at arbeiða, sjálvt um tey eru komin upp til pensiónsaldur. Tað hevur verið grundin til, at feiri uppskot hava verið løgd fram í hesum valskeiðnum, sum øll eru feld.

Tað seinasta, sum varð viðgjørt her var uppskotið frá Fólkaflokkinum, og har var tað broyting í skattaviðurskiftunum hjá fólkapensionistum. Tá ið hetta mál varð viðgjørt í nevndini, vísti tað seg, at tað kundi ikki fáast semja um at gjøgnumføra tað málið, men tað vísti seg at vera ein ávísur áhugi fyri at hjálpa upp á pensionistarna, teir, sum mistu við at fáa aðra arbeiðsinntøku. Vit samráddust so fram til eitt uppskot, og tað varð sama greiða uppskotið, sum Sambandsflokkurin framman undan hevði havt her á tingi, og samgongan hevði felt. Nú vísti tað seg, at ein samd skattanevnd setti hetta uppskotið fram.

Tað kom sum sagt niðan higar, men tá ið tað so kom til aðru viðgerð og skuldi avgreiðast, vísti tað seg beinanvegin, at Tjóðveldisflokkurin kundi ikki ganga við til at hjálpa pensionistunum. Fyrst ið tað varð viðmerkt frá plássinum av einum límí í Tjóðveldisflokkinum um hetta málið, ja, so var formaðurin í nevndini, sum er javnaðarmaður, fyrsti maður at leypa frá, og hann tók bara málið aftur, sum ein samd nevnd hevði arbeitt við og ætlaði at fáa gjøgnumført, fyri at tað skuldi hjálpa upp á hesar pensionistar, sum umtalaðir eru.

Sostatt varð hetta málið afturtikið, men soleiðis, sum okkara skipan er, hevur man loyvi at taka tað upp aftur, og tað varð uppafturtikið. Tá vísti tað seg, at teir kundu ikki standa við tað loyví, teir høvdu givið, hvørki menninir frá Tjóðveldisflokkinum ei heldur frá Javnaðarflokkinum.

Nú er sum sagt eitt annað uppskot lagt fram, og hetta sær út til at fara eitt sindur víðari. Her er serviðbót til ávísar pensionistar, t.v.s. avlamispensionistar og einkjupensionistar eru tikin við eisini afturat

fólkapensionistunum.

Sjálvsagt kemur hetta at kosta hópin meira enn tey uppskotini, eg havi tosað um frammanundan. Fer man, sum vanligt er, at hyggja í viðmerkingarnar, hvat ið ætlanin hjá landsstýrinum er, so sær tað eitt sindur løgið út, tí at tað stendur í viðmerkingunum her, at ætlan Framsóknarfloksins var ikki at biðja danir gjalda meira av avlamis- og fólkapensión til Føroyar, fyri tað um eldri og partvíst avlamnir føroyingar ynskja at arbeiða t.d. hálva tíð á einum føroyskum flakavirki fyri at vinna afturat pensiónini. T.v.s. at man fær ikki ein gang heldur at vita her, hvat ið ætlan landsstýrisins er. Høvdið, tað er landsstýrið, men restin er Framsóknarflokkurin, so tað er ikki komið so frægt fram her heldur, hvat ætlan landsstýrisins er í hesum máli. So eg haldi, tað er ógvuliga jánkasligt, men mær tykir, at vit áttu at roynt at gjøgnumført hetta her. Formaðurin í skattanevndini átti at tikið sær um reiggj at torað at staðið við tað, sum hann sigur seg at meina, og ikki leypa frá, tá ið á stendur, og fingið hjálpt upp á hetta, at vit fingu broyting í fólkapensiónsviðurskiftini hjá okkum.

Tá ið nú hetta lógaruppskotið er komið, og tað vísir seg, at nú skulu vit fara longur enn tað, ið tosað hevur verið um, út um fólkapensionistarnar, so fari eg at royna eisini í skattanevndini, sum eg meti hetta málið eigur at fara til, at koma við onkrum øðrum ynskjum eisini, tí tað er soleiðis, at vit hava skipanir, sum virka eitt sindur keðiliga hjá okkum.

Har hugsi eg um avlamispensiónina, tí tað er soleiðis, at upphæddin, sum ein avlamispensionistur fær, er eitt sindur hægri enn fólkapensiónin. Tá ið hesin avlamispensionistur verður bæði avlamin og gamal, fær hann eitt soljóðandi skriv frá Almannastovuni: "Tá tygum hava fylt ella fylla 67 ár tann (dato), so kunnu tygum ikki longur fáa avlamispensión. Í staðin koma tygum frá sama degi at fáa fólkapensión. Vit gera vart við, at fólkapensiónin er kr. 1.555,- lægri um mánaðin enn avlamispensiónin". Hetta er tað, sum ein avlamispensionistur fær at vita aftaná, at hann nú eisini er vorðin

gamal, at nú skal tað minkast um mánaðin við 1.555,- kr. Eg fari at royna í nevndini, um vit kunnu fáa eina broyting í hesum soleiðis, at tað ikki verða so stórar upphæddir í einum, um eitt menniskja fyllir 67 ár.

Sum sagt, málið skal fáa eina góða viðgerð frá okkara síðu í skattanevndini.

Heini O. Heinesen (tí)

Harra formaður.

Tað var ikki nógv, ið eg skuldi skoyta upp í tað, sum fram er komið. Hetta hevur verið tugt væl og virðiliga gjøgnum hesi 4 árini, henda samgongan hevur sitið, men tá ið eg nú hoyrdi Agnar Nielsen, fór eg at ivast í, um hann hevði skift flokk, tí hann segði nakað soleiðis: "Henda samgongan tordi ikki at taka almannamálini við í blokkstuðninginum".

Trupulleikin við at gera hesar broytingarnar hevur verið tann, at danir hava viljað havt eins víðurskifti í Føroyum og í Danmark við pensiónsviðurskiftum, tað veit Agnar Nielsen sera væl.

Fyri at koma til tað, sum kjarnin í málinum er, tað er tá ið man tosar um skatt hjá pensionístum, tað sama er eisini aðrar lógir, serlógir, sum eru galdandi fyri skatting, ella tá ið skúlaungdómur kann tjena so og so nógv uttan, at tað verður skattað, hasi viðurskiftini hevði man kunnað broytt við at broytt skattastigan.

Skattastigin er so mikið harður, at ein fólkapensionistur skal hava 12.000 kr. frádrignar fyri at verða skattafríur, um tað er ein vanlig inntøka. Um menn her í tinginum meina, at hatta er ein rættvísur skattastigi, so trúgvi eg, tað loysir seg ikki at standa og tosa fyri opnari mikrofon oftani og rósa sær av, hvussu góðir teir eru við tey minni mentu, - tað orðið vilja teir nú ikki brúka, eg vil heldur ikki brúka tað, - men hatta verður ofta brúkt, og um man meinar nakað við hatta har, so skal man taka og broyta skattastigan. Nú skal eg ikki siga, man skal koyra skattin langt upp um 50%, tí nú er eitt uppskot komið í tingið í dag um at lækka skattin. So er spurningurin, hvar man so skal taka pengarnar frá,

tá ið man lækkar skattin.

Eg vildi hildið, at leiðin at gingið vildi verðið betri at broytt skattastigan, so slapp man frá øllum hesum serstøku lógunum, tí so vildi ein fólkapensionistur, sum fór til arbeiðis, verðið skattaður so líðandi, man kundi sagt sum so, at tað var skattafrítt har upp til hjá øllum. Eg haldi ikki eg skal skoyta nakað upp í hatta.

Tá ið Agnar Nielsen segði, at vit máttu taka tað uppskotið aftur, so veit hann væl, hvør orsøkin var. Tað er nakað leingi at greiða frá tí, sum vit gjørdu í skattanevndini seinast. Eg var ein av teimum, sum tók undir við málinum. Eg havi ein vilja til at broyta hesi viðurskiftini. Men at broyta tey eftir teimum treytum, sum Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin, vil eg als ikki verða við til, tað er heilt víst.

Jógvan Sundstein (ff)

Harra formaður.

Tað eru tveir orðførarar, sum hava havt orðið, ið hvussu so er tann fyrri, Agnar Nielsen fyri Sambandsflokkin, undraðist á, hvørjum hetta uppskot kom frá, tí høvdið er Føroya landsstýri, men lesur man viðmerkingarnar, so sær tað út til, at tað er Framburðsflokkurin, sum hevur lagt uppskotið fram. Nú visti eg ikki, at Klaus Hermann var skrivari hjá Framburðsflokkinum, men tað sær næstan soleiðis út, soleiðis sum undirskriftin er her.

Hetta uppskotið líkist einum uppskoti frá Framburðsflokkinum, líkist partvíst einum uppskoti frá Sambandsflokkinum eisini, sum hevur verið fyri her.

Trupulleikin við hesum uppskotinum er bara tann, at hann loysir ongar trupulleikar hjá pensionistunum. Tað einasta man fær burtur úr hesum er, at tær almennu útreiðslurnar verða hægri, man rinda einar 7-8 mió.kr. meira í almennum útreiðslum uttan, at pensionistarnar fáa nakað serligt burtur úr hesum, tí at tá ið man skal kunna vinna so og so nógv og behalda viðbøturnar, so verður skatturin hjá pensionistunum bara beinanvegin so

nógv størri, samstundis sum tær almennu útreiðslurnar hækka. Tí er vegurin at ganga nógv heldur tann, at grunduppheddin til fólkapensión og avlamispensión verður gjørd skattafrí, og hetta vil gera, at pensionisturin hevur nógv meira av peningi, sum hann kann hava til sín sjálvs, og at tær almennnu útreiðslurnar ella tapið hjá landskassanum verður minimerað til næstan einki við tað, at tá fara fleiri fólk út at arbeiða í staðin fyri. Tað vildi skattanevndin ikki viðgera seinast, men minnist meg rætt, so liggur uppskotið hjá Fólkaflokkinum framvegis í skattanevndini, nú skattanevndin varð gjørd til millumtinganevnd fyri at viðgera tað uppskotið, og tí vil eg heita á formannin í skattanevndini um at fáa tað uppskotið viðgjørt.

Hetta uppskotið, sum her fyriliggur, hoyrir jú ikki heima í skattanevndini. Hetta er ikki eitt skattamál, hetta er eitt uppskot um at hækka viðbøturnar til pensionistar, og tí er hetta eitt almannamál og hoyrir heima í almanna- og heilsunevndini og má fáa viðgerð har.

Uppskotið hjá Fólkaflokkinum liggur framvegis í skattanevndini, og har vóni eg, at tað fær sína viðgerð.

Jákup Lindenskov (jv)

Harra formaður.

Eg taki undir við, at hetta málið fer í almanna- og heilsunevndina, eg haldi, tað hoyrir heima har.

Her hava vit eitt uppskot, sum ber í sær teir tankar, sum hava verið frammi her í tinginum í gjøgnum nógv Harrans ár, hvussu vit kundu koma fólki undan at skula missa so stóran part av pensiónini, um tey fóru at arbeiða.

Vit í Javnaðarflokkinum taka sjálvsagt undir við hesum uppskotinum, men tað tókti mær eisini, tá ið málið varð lagt fram, at vera eitt lítið sindur av einum misljóði í viðmerkingunum, tá ið tað var meira enn beinleiðis landsstýrið, sum stendur at hava arbeitt hetta her málið ígjøgnum. Tí vit hava øll verið um at finna fram til eina nøkulunda haldgóða loysn fyri okkara pen-

sionistar soleiðis, at vit kundu síggja teimum til góðar, sum høvdu tørv fyri at fáa eina størri upphædd útgoldna, sjálvt um tey eisini arbeiddu.

Haraftrat vil eg siga í hvussu er út frá mínum principiella sjónarmiði, so koma vit støðugt líka sum at gloyma tann partin, sum ikki hevur møguleika at hava eitt arbeiði við síðuna av. Hann kemur ikki at njóta gott av tí, at ein arbeiðsinntøka afturat pensóniní verður premierað, sjálvt um vit kunnu siga, at ein fittliga stórur partur kemur at njóta gagn av hesum uppskoti, og haraftrat at fólk kemur í arbeiði meira, enn tað er í løtuni, tí tey kunnu vinna sær eitt sindur meira nettup nú í eini tíð, tá ið vit hava brúk fyri allari arbeiðskraft, sum er í Føroyum og meira afturat.

Eg má siga akkurát sum er, vit hava ikki havt tær stóru umstøðurnar at karna tey einstøku tølini, sum eru komin fram í yvirlitunum, sum liggja her, men eg vóni, at vit í nevndini kunnu koma til eitt úrslit soleiðis, at hetta her málið kann verða avgreitt nú og fáa gildi frá komandi ári.

Annars stendur eisini í viðmerkingunum til lógina, eg haldi tað er rætt, at tað stendur bara alt ov sjáldan, til seinast hetta, at neyðugt verður at seta 2 fólk til at umsita hesa her viðbótina. Um hetta ikki er í stórum tali, so mugu vit nokk siga, eisini eitt tílíkt uppskot bitur okkum líka sum í hin endan, at vit framvegis skulu toga fólk frá vinnulívinum til umsitingina. Tað má kanska verða soleiðis, men eg haldi ikki, at tað er tað hepnasta nettup í hesari tíð, tá ið tað er so stórt brúk fyri fólki í vinnulívinum, serliga í fiskivinnuni, at hvørja ferð vit samtykkja nakað her á tingi, skal umsitingin toga frá 2 fólkum og upp til kanska 20 hvørja ferð. Vit halda, vit gera nakað, sum er til bata fyri hetta samfelag. Takk.

Aðolf V. Hansen (fr)

Harra formaður,

Tað skal verða ógvuliga stutt hjá mær. Tað eru fleiri, sum líka sum hava fingið eitt sindur ilt av, at

Framsóknarflokkurin er komin upp í her, og eg eri líka við at biðja um fyrigeving fyri tað, men tað fari eg ikki at gera.

Frágreiðingin í hesum er í byrjanini av viðmerkingunum, eg fari at biðja um loyvi til at lesa, her stendur: "Í løgtingsmáli nr. 132 er samtykt", og so stendur viðari um hetta her. Tað er tað málið, man refererar til, tá ið man ovast á næstu síðu í viðmerkingunum sigur, "tað var ikki ætlanin hjá Framsóknarflokkinum", man kann ikki siga har "ætlan landsstýrisins var ikki at biðja danir gjalda meira", tað kann man ikki, tí tað var Framsóknarflokkurin, sum legði tað málið fyri tingið, og tí kann tað ikki standa Føroya landsstýri har, hvussu fegin man vil. Tað er tað, sum teir referera til, hvat ið var ætlanin hjá tí flokki, sum kom á ting við hesum her.

Seinni er so kend ein fusión millum Framsóknarflokkin og restina av tí tá brotnu samgonguna, tað hevur so resultera í, at hetta verður gjøgnumført, men annars hugsi eg, eg tori at siga, at tað hevur verið væl móttikið av teimum, sum hava verið, sjálvandi roynir onkur at fáa tað yvir á, at teirra egnu nál vóru so nógv betur. Tað er møguligt, at eftir teirra áskoðan vóru tey betur, men tað er bæði áskoðanin hjá Framsóknarflokkinum og, eg haldi, hjá allari samgonguni, at hetta er frægasti mátin at loysa tað uppá.

Søkin er tann, at tá ið fólk fara út at arbeiða, gjalda tey vanligan skatt, men tey missa av pensiónini ymsar viðbøtur. Tað, sum man ger við hesum her, er, at man sigur, at man skal framvegis missa viðbøturnar, men so fær man tær endurgoldnar, tað er henda serviðbótin, og so sleppur man undan at blanda danir upp í hetta málið.

Eg vil gjøgnum formannin sjálvandi siga Fólkaflokkinum, at teir skuldu frøtt seg um tað, tað er jú eitt sindur á sjálvstýrisleið stig fyri stig, ið hvussu so er, tí nú skulu vit gjalda handa partin meira av pensiónini. Eg haldi, at vit skulu bara frøast um tað, at vit klára eitt lítið sindur meira sjálvi og heldur enn at fara at klandrast um, hvør, ið er komin við hesum, og

hvussu tað er komið, so heldur fara at royna at klára eitt lítið sindur meira sjálvir enn hetta her eisini og samla kreftirnar um tað.

Sverre Midjord (jv)

Harra formaður.

Tað er rætt, sum Agnar Nielsen segði. Tað var eitt mál frammi her í tí orrustu, sum var í endanum á tingsetuni seinast um pensiónsviðurskifti. Tað varð tikið aftur. Tað er betur at taka eitt mál aftur, enn at lata tað verða felt á tingi.

Annars nevndi Agnar Nielsen, at avlamispensionistar, tá ið teir verða so gamlir, at teir fara yvir til fólkapensiónina, missa ein part av pengunum. Agnar Nielsen, háttvirdi løgtingsmaður, veit væl tað, at tað er ikki nakað nýtt fyribrigdi. Tað er tann gamla lógin, sum vit hava brúkt her í Føroyum, og bað hevur væl staðið Agnari Nielsen eins væl og øðrum løgtingsmonnum frítt fyri at fingið hana broytta øll árini, teir hava sitið her, 10, 15 og 20 ár.

Tá ið fólkapensiónin í sini tíð kom til Føroyar, minnast vit væl, at Sambandsflokkurin vildi ikki, at fólkapensionistarnir í Føroyum skuldu fáa hana í einum, tað varð til á kontogjøld, so vælvildin hjá Sambandsflokkinum yvir fyri fólkapensionisturum er helst bara upp undir val, tað finna fólka- og avlamispensionistarnir sjálvir út av.

Annars vil eg halda, at tað er rætt, sum Heini O. Heinesen sigur, at man skal bøta um hasi viðurskiftini yvir skattastigan.

Tað er einki mark fyri, at peningur verður játtaður, tá ið tað er til bygningar o.t., men beinanvegin vit koma til teirra, sum hava lagt grundarlagið undir hetta samfelagið, so fara vit beinanvegin at tosa um, at so skal tað klípast her, og so skal tað klípast har.

Eg vil verða við til í skattanevndini saman við háttvirda løgtingsmanni Agnari Nielsen og Jógvani Sundstein, Heina O. Heinesen og øðrum at royna at bøta hesi viðurskiftini. Vit mugu koma til ta niðurstøðu, at

fólkapensionistarnir, um teir hava hug at arbeiða, skulu hava loyvi til at arbeiða, uttan at missa hesar viðbøturnar.

Tað er eitt kompliserað lógarverk, sum ger tað, at tað er eingin fyrimunur hjá teimum at arbeiða. Í staðin fyrí, at man gjørdi tað á tann hátt, at tey fingu loyvi at arbeiða, uttan at missa sína pensión.

Tað var onkur, sum nevndi her, at hetta uppskotið, sum fyriliggur og sum fer í almanna- og heilsunevndina fer at økja um útreiðslurnar. Eg havi ongan løgtingsmann hoyrt finnast at, at onnur viðurskifti, sun hava minni týdning í samfelagnum økja um útreiðslurnar hjá landskassanum. Nú verður tosað um, at tað verður økt um útreiðslurnar hjá landskassanum. Eg haldi, at vit skulu viðgera fólkapensionistarnar bæði í skattanevndini og almanna- og heilsunevndini. Tað er eitt uppskot frá Fólkaflokkinum, sum Jógvan Sundstein nevndi, sum er eitt gott grundarlag at byggja á, og vit í skattanevndini skulu nokk finna ein millumveg, so at tey kunnu síggja, at tað høast alt er ein vilji til at bøta um støðuna, tað vil eg ið hvussu so er ganga við til.

Hetta málið hoyrir heima í almanna- og heilsunevndini, og vit kunnu ið hvussu er royna at bøta um viðurskiftini í skattanevndini út frá tí uppskotinum, sum liggur frammanundan um sama mál. Takk fyri harra formaður.

Formaðurin

So eru ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað.

Málið verður beint til viðgerðar í almanna- og heilsunevndini.

Agnar Nielsen (sb)

Var tað uttan atkvøðugreiðslu? Fyrsta uppskotið var skattanevndin, uppskotið, sum kom um at afturgjalda pensionistunum, tað kom frá skattanevndini seinast.

Formaðurin

Eg skilti tað soleiðis, at uppskotið um skattanevndina varð afturtikið, men sendur tað uppskotið um skattanevndina við?

Tað sær ikki út sum, tað uppskotið stendur við, so málið verður beint í almanna- og heilsunevndina uttan atkvøðugreiðslu.

Eg skal boða frá einum fyrispurningi til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Heina O. Heinesen. Støða veður tikin til tann fyrispurningin á seinni fundi. Tað er um telefonviðurskiftini í Svínoynni.

Tað er komið eitt skriv til tingið frá Føroya arbeiðarafelag viðvíkjandi uppskoti um broytingar av dagpeningalógini og skattalógini. Tað verður upplýst, at felagið arbeiðir við uppskoti um broytingar í hesum lógum, og at fullfíggjað uppskot við viðmerkingum verða send løgtinginum í komandi viku.

Síðani er komið soljóðandi skriv frá Felagskommununi í Vágum, viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 4 til loysn av flogvallarspurninginum í Føroyum. Eftir sum tað málið kemur til viðgerðar nú, verður tað brævið lisið upp við fullum orðaljóði:

"Í samband við at Føroya løgting hevur til viðgerðar uppskot til løgtingslóg at steðga øllum útbyggingum av Vága floghavn og undirsjóvartunnlinum um Vestmannasund loyva vit okkum at koma við hesum viðmerkingum. Í fyrsta lagi loyva vit okkum at ganga út frá, at ikki finnist meiriluti í løgtinginum fyri uppskotinum, og at tað tí fellur við 1. atkvøðugreiðslu, men í øðrum lagi loyva vit okkum at vísa á, at hetta, at løgtingið hevur til viðgerðar mál um at steðga øllum útbyggingum við vøllin her vesturi, skjótt kann fáa negativa ávirkan á donsku flogvallarmyndugleikarnar, tá tað snýr seg um at játta smærri upphæddir til neyðugar ábøtur.

Vit í Felagskommununi í Vágum kenna okkum sannførd um, at tess skjótari hetta tingmál verður avgreitt av løgtinginum tess betur.

Sostatt loyva vit okkum at heita á løgtingið um at bera so í bandi, at løgtingsmál nr. 4 verður avgreitt,

áðrenn løgtingið fer heim í hesum umfarinum."

Síðani kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 4 og saman við tí 1. viðgerð av tingmáli nr. 5. Har er tað soleiðis, at uppskotsstillarin hevur biðið um, at málini steðga, til hann kemur aftur, hann er burturstaddur.

Har hevur so svarið verið tað, at ætlanin var at fáa allar 1. viðgerðir frá hondini í kvøld í seinasta lagi, og tann ætlanin stendur so við. Síðani er ætlanin at fáa øll nevndarálitini fram til tingfundin týsmorgunin, og verður tað tí nú heitt á nevndarformenninar um, at hava síni álit klár so skjótt, sum møguligt soleiðis, at ikki allir nevndarformenn koma samstundis til skriving ar við sínum álitum, tað hevði verið ein fyrimunur.

Jógvan Sundstein

Poul Michelsen er sum sagt burturstaddur, og tí hevði eg fegin viljað, at hatta uppskotið kom til viðgerðar, tá ið hann kemur aftur í næstu viku, men um tað er soleiðis, at tingið ynskir at fáa 1. viðgerðirnar avgreiddar nú, so haldi eg, vit tá skuldu givið honum rætt til ið hvussu so undir 2. viðgerð, at føra fram síni sjónarmið.

Formaðurin

Við 2. viðgerð fær Poul Michelsen somu talutíð, sum aðrir tingmenn. Eg haldi, tað mann verða rættiliga óvanlig praksis at koma inn á, at ávísir tingmenn fáa longri talutíð undir eini 2. viðgerð, enn aðrir tingmenn fáa. Hann fær pricis tað somu talutíð, sum aðrir tingmenn fáa.

(Jógvan Sundstein tosar aftanfyri)

Formaðurin fer ikki at blanda seg í ta viðgerðina.

Síðani er ætlanin, at hava fund aftur aftan á viðgerðina av hesum báðum flogvallarmálunum undir einum, og í tí sambandi verður so neyðugt at biðja um loyvi til frávik frá tíðarfreistini, tí at tey mál, sum nú verða eftir til 1. viðgerð í kvøld, hava ikki ligið nóg leingi

frammi.

Um eingin mælir ímóti, at tað verður vikið frá tíðarfreistini, so verður tað samtykt.

Haraftrat verður sagt frá, at seinasta freist til framløgu av nýggjum málum er á komandi fundi soleiðis, at tað verða ikki framløgd nøkur nýggj mál á tingfundinum týsdagin. Tað er ein stutt freist, men eg hugsi, at tað hevur hingið í luftini, at 1. viðgerðirnar ið hvussu er skuldu fara frá hondini í hesari vikuni. So er tað samtykt.

Síðani kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 4 og av tingmáli nr. 5. Hvør biður um orðið? Tað er eingin, sum biður um orðið. Jógvan Sundstein biður um orðið.

Jógvan Sundstein (ff)

Harra formaður.

Tað eru tvey mál, sum eru til 1. viðgerð saman, og tey eru bæði løgd fram av Poul Michelsen, løgtingsmanni. Annað er tingmál nr. 5: Krøv til framtíðar flogvøll í Føroyum, og hitt er tingmál nr. 4: Loysn av flogvallarspurninginum í Føroyum.

Tað fyrra uppskotið er eitt uppskot til samtyktar, við formansins loyvi kann eg kanska lesa uppskotið upp.

"Føroya løgting samtykkir fyri at tryggja framtíðar flogsamband fram yvir við útheimin, at Flogvøllur Føroya skal lúka ICAO krøv, sett í kodu 4 og kategori 1 bólkinum. Best varð, um vøllurin kann gerast 3.000 m langur, men hann má ikki verða stytri enn 2.200 m."

Hitt uppskotið er eitt lógaruppskot, sum inniheldur ávísar ásetingar um, at eingin størri útbygging av Vága floghavn verður gjørd, fyrr enn henda inngongur í eina samlaða meting um framtíðar flogvøll í Føroyum og har aftrat, at undirsjóvartunnilin, ið er partur av hesi útbygging, eigur at verða umfataður av hesi lóg. T.v.s. at annað uppskotið, tað fyrra, sum eg nevndi, nr. 5 er eitt meira principielt uppskot um framtíðar útbygging av floghavn í Føroyum, meðan tað seinna er eitt uppskot, sum beinleiðis og konkret gongur út uppá, at avmarka

útbyggingina vesturi í Vágum, og í § 2 at avtaka løgtingssamtyktina um undirsjóvartunnilin millum Vágarnar og Streymoynna.

Lat meg fyrst siga um tað fyrra uppskotið løgtingsmál nr. 5, at tað uppskotið sjálvandi er so mikið principielt, at tað eigur at verða viðgjørt, eigur at verða kannað og hevur perspektiv longur fram enn bert til nærmastu framtíð. Eg veit, at tað liggja uppskot her á tingi um kanning av flogvallaviðurskiftunum í Føroyum, og tí haldi eg, at tað uppskotið náttúrliga hoyrir heima í tí nevnd, sum hini uppskotíni liggja í, og so vitt eg veit, er tað samferðslunevndin hjá løgtingirum. So eg haldi, at tað uppskotið kann fáa víðari viðgerð, víðari kanning har, hvar hesi sjónarmiðini kunnu njóta frama og verða viðgjørd víðari.

Viðv. uppskotinum um at steðga útbyggingini í Vágum og serliga uppskotið um at steðga undirsjóvartunnlinum kann eg siga, at spurningurin um ein undirsjóvartunnil millum Vágarnar og Streymoynna, er ein spurningur um at byggja eina farleið í millum tvær oyggjar soleiðis, sum vit hava bygt aðrar farleiðir her á landi, bæði vegir, brýr og tunnlar.

Hetta uppskotið hevur verið viðgjørt her á tingi, tað hevur verið tosað um, hvussu ein slíkur tunnil skal gerast. Uppskotið frá kommununum vesturi í Vágum hevur verið framlagt her á tingi til kunningar fyri allar tingmenn. Tað varð ikki samtykt av landsstýrinum, men varð í broyttum líki lagt fyri tingið.

Spurningurin um gjaldið av hesari íløgu hevur eisini verið viðgjørdur her á tingi og hevur fyri so vítt eisíni fingið sína samtykt her, hvar tað, at brúksgjald verður álagt í samband við tunnlarnar, hevur tingið stuðul av meiriluta á Føroya løgtingi.

Fólkaflokkurin atkvøddi fyri, at undirsjóvartunnilin skuldi gerast, og eg kann her boða frá, at tá ið uppskotið her kemur frá einum fólkaflokstingmanni um at avtaka hesa samtykt tingsins, so tær tað ikki undirtøku annars frá Fólkaflokkinum. Vit standa við okkara samtykt, okkara atkvøðugreiðslu í tinginum um, at undirsjóvartunnilin skal verða gjørdur út frá teimum fyri-

treytum, ið tá vóru. Vit hava ikki ynskt at blandað undirsjóvartunnilin saman við nakra flogvallarútbygging og møguliga aðra framtíð viðvíkjandi flogvølli her í Føroyum.

Vit ynskja at hesin undirsjóvartunnil kemur og so leingi, ið hvussu so er, sum flogvøllurin í Vágum er einasti flogvøllur í landinum, so mugu í øllum førum neyðugar ábøtur verða gjørdar á tann flogvøllin.

Anfinn Kallsberg (ff.)

Harra formaður.

Eg skal leggja ógvuliga lítið aftrat tí, sum formaðurin bar fram. Eg vil bara boða frá míni støðutakan til hesi málini her, tí tað hevur líka sum verið gitt um, hvar Fólkaflokkurin stendur í hesum málinum, og tað, haldi eg, skal ikki verða nøkur loyna, at tingmál nr. 4 um at steðga útbyggingini av floghavnini vesturí í Vágum og at steðga undirsjóvartunnlinum taki eg í øllum førum als ikki undir við. Viðvíkjandi tingmáli nr. 5, um krøv til framtíðar flogvøll í Føroyum, har er støðan tann, at eg sum vanligur tingmaður ikki hava møguleika at seta meg inn í ta teknisku síðuna av øllum hesum, men hesi viðurskiftini verða kannað av eini nevnd, eftir einum uppskoti frá Svend Aage Ellefsen og eg haldi tí, at tað er heilt náttúrligt at hetta málið verður beint til ta nevndina, og at hetta uppskotið verður viðgjørt saman við tí uppskotinum, sum fyriliggur har.

Heini O. Heinesen (tf.)

Harra formaður.

Tað hevur fleiri ferðir verið ført fram, ella tað var onkur góður maður, sum segði tað, nú kann eg ikki júst nevna perónin, at í Fólkaflokkinum er hvørki høvd ella hali og heldur ikki formaður og stavnamaður, so tá kann man koma til hesa niðurstøðuna. Eg kann gott siga, at eg kann yvir høvur ikki taka undir við hesum báðum uppskotunum um at niðurleggja einastu floghavn, sum vit hava og so gera kanningar, sum eru gjørdar. Vit hava 3 kanningar, sum er eitt drúgvt tilfar at lesa ígjøgnum,

sum eru gjørdar og nú hevur Havnar kommuna goldið 12 mió.kr., havi eg hoyrt, fyri at gera aðrar kanningar bara fyri at reklamera fyri einum ávísum flokki her í Suðurstreymoy. Eg haldi, at hatta er heilt burturvið og hvussu leingi Føroya fólk skal verða plágað av hesum sjónleikinum frá hasum flokkinum, má eg siga, rætt sum er, at eg skiljí ikki, at tann føroyski veljarin ikki vendir hasum flokkinum bakið.

So var tað nakað annað, sum eg las í Dagblaðnum, har stendur nokk so nógv skrivað, so tað kann verða nokk so áhugavert at lesa sumt av tí. Har var tað vágatingmaðurin fyri Fólkaflokkin, nú veit eg ikki, um hann hevur meldað seg úr flokkinum, tað er møguligt, hann segði so íð hvussu so er tað um formannin í Fólkaflokkinum táverandi formann, hann skírdi hann fyri komandi løgmaður, soleiðis stóð, um eg minnist rætt, at vit hava ikki ráð til 2 flogvallir. Nú hoyrdu vit hann her uppi, sum hann tosaði, so tók hann fult undir við undirsjóvartunnli og flogvølli á Glyvursnesi, so hetta er heilt spennandi, so tað verða nýggjar inntøkukeldur, sum føroyingar koma at fáa, tá ið Fólkaflokkurin kemur framat, og eitt vita vit heilt vist, at kemur Fólkaflokkurin at stýra tey næstu 4 árini, so verður flogvøllurin í Vágum niðurlagdur, og tað veit Svend Aage eisini.

Jógvan Sundstein (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Hevur man loyvi til beinleiðis at seta spurning til formannin? So vil eg spyrja formannin, var Heini O. Holmesen í tingsalinum, tá ið eg helt mína røðu?

Formaðurin

Also, tingmenn verða bidnir um at fylgja við tí teir sjálvir siga og fylgja sjálvir við, hvønn teir tosa við og hvørjir tingmenn eru staddir í salinum, tá ið teir tosa. Verandi røðari plagar íð hvussu so er ofta at heva á máli, hvør staddur er her undir ymsum viðgerðum.

Jógvan Sundstein (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Eg havi bara ta viðmerking til Heina O. Heinesen, at hann kann also ikki hava lurtað eftir tí, ið eg havi sagt. Eg tók undir við undirsjóvartunnlinum. Vit hava atkvøtt fyri honum, vit standa við ta atkvøðurgreiðslu, sum har varð gjørd. Eg havi ikki tikið undir við nøkrum flogvølli á Glyvursnesi, heldur ikki í míni røðu, sum eg helt her.

Eg segði, at tað uppskotið, sum lá her, átti at fara í Samferðslunevndina til tær kanningar, sum annars har verða gjørdar. Annars gongur tað uppskotið, so vitt eg dugi at lesa tað, heldur ikki út upp á nakran flogvøll á Glyvursnesi men út upp á, at ein flogvøllur skal uppfylla ávísar treytir, og ikki hvar hann skal liggja.

Eg havi eisini sagt, og tað standi eg eisini við, at føroyska samfelagið hevur ikki ráð til at byggja ein flogvøll í nærmastu framtíð fyri millum eina hálva og eina heila milliard, eins og tað føroyska samfelagið heldur ikki hevur ráð til innan fyri eitt stutt tíðarskeið at byggja og gera øll tey projekt, sum hetta háttvirda ting hevur samtykt seinastu tíðina. Tað skal ein nógv neyvari prioritering til, fyri øll tey projekt, sum eru frammi í tíðini, áðrenn tey kunnu verða gjørd, áðrenn peningurin kann nýtast til alt hetta her.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður,

Nú má eg aftur spyrja formannin, um Jógvan Sundstein var í tingsalinum, tá ið eg hevði orðið. Tí eg nevndi ikki í tí, sum eg segði, at Jógvan Sundstein ikki tók undir við undirsjóvartunnlinum, tað segði hann greitt og týðuligt. Men hann segði hesi orðini: "So leingi flogvøllurin í Vágum er einasti flogvøllur í Føroyum", so leingi, tað var tað, sum hann segði. So tað verður neyðugt at gera tær neyðugu útbyggingarnar, so at har er vón fyri einum flogvølli á Glyvursnesi, tað var tað, sum eg meinti, tað var ikki nakað annað. Serliga um

hann er komandi løgmaður, so haldi eg, at man kann rokna við tí.

Sverre Midjord (jv.)

Harra formaður.

Hetta eru tvey sera áhugaverd mál, sum eru fyri nú. Vit hava upplivað tað fyrr, at umboð fyri Fólkaflokkin seta mál fram, sum flokkurin ikki stendur aftan fyri. Um tað so bara er fyri at gardera seg, at man ikki er fyri tí og so, tá ið tað avtornar, so er man tað kortini, tað skal eg lata vera við at siga.

Í tingmáli nr. 4, sum viðvíkur sambandinum millum Vágoynna og inn á meginlandið, sigur býráðsformaðurin í Havn, háttvirdi løgtingsmaður Poul Michelsen, at hann vil arbeiða ímóti. Tað er heilt óvanligt, at tingmenn búgvandi í einum heilt øðrum valdømi skulu forða fyri menningini í útjaðarinum. Annars tykir mær, at Fólkaflokkurin tosar nógv um bygdamenning, eg veit ikki, um tað er bygdamenning at avtofta Vágarnar og flyta tey á Berjabrekku, har er kanska pláss fyri fleiri vágamonnum, tá ið tað einaferð verður liðugt.

Viðvíkandi flogvøllinum, harra formaður, so vil eg fegin sitera nakað í hesum viðmerkingunum, sum Poul Michelsen hevur í máli nr. 5, við formansins loyvi, har hann sigur, at skuldi tað óhugsandi hent, at hædd ikki verður tikin fyri hesum óvanliga, ber føroyska samfelagið kostnaðin av eini sera umfatandi avreiðing bæði so og so. Ikki er dámligt, at nema við trygdarviðurskiftini í samband við flúgving, men hetta er og má verða ein sera týðandi partur av eini flogvallarloysn. Veruleikin er ikki altíð líka tespiligur, men sjónstekin eru til, at líkasæla móti alheims fyrisettum reglum eigur rúmar ræsir bæði hjá føroyskum og donskum myndugleikum.

Eg haldi, at hatta er ein ógvuliga álvarsom skuldseting frá einum løgtingsmanni og frá einum borgarstjóra í Havn sum er største økið hjá okkum, at skuldseta føroyskar og útlendskar myndugleika fyri at verða líkasæl við menniskjalívum. Tað er tað, sum stendur her. Hann sigur í hesum uppskotinum, at tað er vandamikið at flúgva til Vágarnar. Um tað er so vandamikið, sum henda

kanningin, ið Havnar býráð hevur sett í verk, visir, so má flúgvingin steðga í dag og ikki í morgin, men í dag. Aðrir myndugleikar siga, at tað er í lagi, men tað er ikki tað, sum tað snýr seg um. Vit vita væl, at tað ber til at leggja hann niður í Havn, hvør sigur, at tað verður so trygdargott at flúgva á Clyvursnesi? Tað eru aðrar kanningar farnar fram, sum eisini er upplýst her, sum siga, at heilt onnur øki í Føroyum eru betur hóskandi enn Clyvursnes og Vágarnir, t.d. Sandoyggin, so má útbyggingin, sum er neyðug, fara fram í Sandoynni men nú liggur ein flogvøllur í Vágum, og hann hevur ligið har øll árini. Tað er hend ein vanlukka, og hon var av menniskjaligum áðum, verður sagt, og tað snýr seg um eini 100 arbeiðspláss. Skulu vit frá løgtinginum uttan viðari avtofta 100 arbeiðspláss í Vágum fyri at nøkta hesa havisjúkuna, sum teir hava her í Suðurstreymoy? Alt skal leggjast í Suðurstreymoy. Eg kann so ikki fyri mítt viðkomandi verða við til tað.

Eg fari at siga við vágafólk, at valið 8. november í ár er í veruleikanum ikki eitt politiskt val, tað er eitt yvirlivingarval, tað er ein spurningur um at fáa loyvi at liva í friði í Vágum og passa seg sjálvan har vesturi.

Um hetta uppskotið frá býráðsformanninum í Havn verður samtykt, at undirsjóvartunnilin verður steðgaður, at flogvøllurin verður niðurlagdur, ja, so mugu vágamenn flyta til Havnar.

Tað var formaðurin í Sambandsflokkinum, sum í eini grein í Dimmalætting skrivaði, hvussu dýrt tað var hjá vágafólki at keypa skógvar, so lætt tók hann upp á uppgávuna. Tað er ikki so lætt hjá okkum, vit taka tað álvarsamt, tí hetta eru arbeiðspláss, fólk hava sett seg niður í Vágum og higartil, Jesus havi lov, eru ikki tær stóru vanlukkurnar hendar í Vágum, so um Poul Michelsen kann siga her og nú, at myndugleikarnir í Føroyum og Danmark spæla hund við menniskjalívum í Føroyum, tí tað sigur hann í uppskotinum. Hann sigur bart út her, "at veruleikin er ikki altíð líka tespiligur, men sjónstekin eru til, at líkasæla við menniskjalívum", tað sigur hann her, "mótvegis alheims fyrisettum reglum eiga rúmar

ræsur bæði hjá føroyskum og donskum myndugleikum.

Tað er harmiligt, at háttvirdi tinglimurin Poul Michelsen, býráðsformaðurin í Havn, ikki er her í dag, eg veit ikki, hvørjar myndugleikar, hann hevur at kanna hesar møguleikarnar. So skulu vit pástanda yvir fyri teimum, at tað er líkasæla at leggja tað í Havn, tað trúgvi eg ikki at man kann gera. Fyri mær er tað so eingin diskussión, eg havi atkvætt fyri, at ein undirsjóvartunnil verður gjørdur til Vágarnar fyri, at undirsjóvartunnil verður gjørdur til Vágarnar fyri, at tryggja viðurskiftini hjá teimum at koma til og frá og eisini at tryggja, at flogvøllurin verður liggjandi í Vágum. Tað verður tosað um samfelagsbúskap. Vit hava ikki ráð til at brúka pengar til bæði líkt og ólíkt. Tað er spurningur, um fiskurin, sum verður tikin upp á land, kann gjalda alt hetta ævintýrið, sum fyrigongur her.

Tað fyrsta vit eiga at hugsa um her, er at vit mugu lætta um skattaviðurskiftini, tað mugu vit gera, vit mugu eisini verða við til at lækka lønarviðurskiftini og gera kompensatión yvir skatt og toll.

Hetta at flyta ein heilan flogvøll, bara tí tað passar einstøkum persónum at spæla við hann í einum valstríði her í Suðurstreymi, tað er ósømulig tala, men eg havi skilt á formanninum í Fólkaflokkinum, at hann tekur so, ið hvussu so er, ikki undir við uppskotinum, tað gleðir meg, um tað heldur til 8. november. Takk fyri tað.

Jógvan Sundstein (ff) viðmerking

Harra formaður.

Eg taki undir við summum av tí, ið Sverre Midjord segði, m.a. tað, at man skal ikki brúka pengar til líkt og ólíkt. Eg taki undir við honum í, at skatturin skal setast niður, og at lønirnar skulu setast niður við skattalækkingarkompensatión.

Um eg skal brúka somu metodu, sum Heini Heinesen, so mátti eg koma fram til, at Sverre Midjord eisini var ímóti, at flogvøllurin lá í Vágum, tí hann segði m.a., at hann burdi verðið fluttur í dag og ikki í morgin, tá

ið hann soleiðis rívur orðini út av samanhanginum, sum Heino Heinesen gjørdi í mínum innleggi, men eg leggi ikki tað í hasi orðini, tí eg skilti samanhangið í tí, sum Sverre Midjord segði.

So segði Sverre Midjord, at Fólkaflokkurin vil avtofta Vágarnar. Eg havi her staðið og sagt, at Poul Michelsen hevur lagt hetta uppskotið fram, men annars er allur hin parturin av Fólkaflokkinum í móti hesum uppskoti. Tað var tað, sum eg segði, um Sverre Midjord lurtaði eftir, tá ið eg tosaði fyrru ferð.

Poul Michelsen hevur lagt eitt uppskot fram, sum hann hevur arbeitt við sum býráðsformaður, eitt uppskot, sum hevur undirtøku í Tórshavnar býráð frá Fólkaflokkinum, frá helvtini av Javnaðarflokkinum frá Tjóðveldisflokkinum, frá Sambandsflokkinum, frá Sjálvstýrisflokkinum og frá ið hvussu so er av einum parti av uttanflokkalistanum í Tórshavnar Býráð, tað er tað, sum stendur aftan fyri hatta uppskotið hjá honum.

Tað sum so er hent, er sjálvandi tað, at Poul Michelsen sum tann einasti av hesum samstundis er tingmaður og hevur lagt hetta mál fram á ting, um t.d. javnaðarmaðurin, sum situr í býráðnum, ella sambandsmaðurin høvdu sitið her, so kanska tey høvdu gjørt tað í staðin fyri, tað vita vit ikki, men tað skulu vit heldur ikki blanda inn í hetta orðaskiftið, men eg kann bara endurtaka, at hetta uppskotið, sum her liggur frammi tingmál nr. 4, verður ikki undirtikið og tað geldur líka til og aftan á 8. november harra Sverre Midjord.

Jørgen Thomsen (jv.)

Harra formaður.

Tað var bara ein lítil viðmerking til háttvirda fólkafloksformannin.

Seinast, tá ið vit høvdu undirsjóvartunnilin fyri her á tingi, tá fóru floksformenninir upp á henda pallin og váttaðu at flokkarnir vóru fyri at gera hetta. Nú fáa vit ásannað í dag, at allir Fólkaflokkurin er ikki fyri undirsjóvartunnli, ein sjeyndapartur av honum er í móti at gera undirsjóvartunnil til Vágarnar tað stendur

rimmar fast, tí er tað ikki so eftirfarandi, sum hesin floksformaðurin stóð og segði henda dagin. Takk fyri harra formaður.

Lasse Klein (sj.)

Harra formaður.

Tað var Jógvan Sundstein háttvirdi løgtingsmaður sum greiddi frá, hvørjir stuðlaðu hesum málinum í Tórshavnar býráð. Tað er greitt, tað eru fleiri, sum stuðla hesum málinum, men eg vil samstundin gera greitt yvir fyri Jógvani Sundstein, at Sjálvstýrisflokkurin í Tórshavnar býráð er ikki samdur við Poul Michelsen um, at leggja hetta málið fyri løgtingið, og haraftrat kann eg bara gera heilt greitt, at Sjálvstýrisflokkurin stendur framvegis fastur um ta avgerð, hann hevur tikið um undirsjóvartunnil um Vestmannasund.

Sverre Midjord (jv.) Viðmerking

Harra formaður.

Býráðsformaðurin í Havn, - tað er harmiligt, at hann ikki er til staðar, - er ein stórur álvarsamur faktorur í Fólkaflokkinum, og hann hevur stóra undirtøku har. Sum øllum løgtingslimum kunnugt, so kunngjørdi hann einaferð í summar, at hann legði frá sær fyri bara at kunna røkja býráðsstarvið í Havn, seinni hevur hann aftur tikið ta frásøgnina aftur, og grundgevur tað við, at hansara uppgáva var at syrgja fyri, at undirsjóvartunnilin til Vágarnar ikki kom í gongd, at flogvøllurín á Glyvursnesi gjørdist ein veruleiki, tað varð hansara aðalmál sum komandi løgtingslimur aftur her í løgtinginum, og skuldi tað so hent, at Fólkaflokkurin kom í landsstýrið, og Poul Michelsen verður so ein av teimum, sum skal stuðla Fólkaflokkinum, so trúgvi eg nokk, at Poul, sum tann stóri politikari hann hóast alt er, verður at seta sínar treytir fyri at styðja Fólkaflokkin í cini samgongu, tað eru vit væl allir greiðir yvir, og tað sigur man heldur einki um. Eg sigi ikki Poul ringan fyri, at hann pressar á fyri Havnina, men eg kann ikki

góðtaka, at Havnir skal slúka útjaðaran uttan, at vit gera mótstøðu her, tað gangi eg so ikki við til.

Svend Aage Ellefsen (ff.) Viðmerking

Harra formaður.

Tað var ein lítil viðmerking til Sverra Midjord.

Tað er eingin ivi um tað, at Poul Michelsen er ein góður maður, og hann er ein týðandi maður innan fyri Fólkaflokkin. Um vit nú hyggja eftir støðuni, sum hon er í dag, hvar ið vit hava Poul Michelsen sitandi í tingbólkinum, so hava vit eisini ein annan mann vestan úr Vágum sitandi í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, og vit siggja, at her kemur eitt uppskot fyri løgtingið um at steðga virkseminum vesturi í Vágum, at steðga undirsjóvartunnlinum og tað vísir seg, at tann maðurin vestan úr Vágum, hann hevur 100% av tingmanningini aftan fyri seg uttan Poul Michelsen, tí er tað so ómetaliga umráðandi, vil eg siga, um man skal koma inn á filosofiina hjá Sverra hjá vágafólkum at eiga tann tingmannin innan fyri tingbólkin.

Sverre Midjord (jv.) Viðmerking

Ja, tað er klárt, at Svend Aage Ellefsen háttvirdi løgtingsmaður má hava fullan stuðul frá Fólkaflokkinum, tí sanniliga, hann hongur í einum tunnum tráði, meðan Poul hongur í tí tjúkka tráðnum, og so verður spurningurin, um Poul hevur kanska so mikið skarpar albogar, at tað verður spurningurin, um Jógvan í heila tikið verður nakað aftaná, at Poul kemur inn aftur.

Jógvan Sundstein (ff.) Viðmerking

Harra formaður.

Tað var soleiðis í áðni, tá høvdu vit eitt mál til viðgerðar, sum summir tingmenn fegnir vildu hava burturvíst úr tinginum, tí at tað viðvikti einum einstøkum persóni. Nú siggi eg, at hesir somum menn, sum vildu hava tað málið burturvíst, standa her og viðgerða ein

persón, sum ikki er til staðar.

Vit hava biðið um, at hetta málið kundi fáa viðgerð seinri, ti at Poul Michelsen, uppskotstillarin, ikki var her, soleiðis at hann kundi svarað fyri seg og framført sini sjónarmið, tað fingu vit ikki eftirlíkað. Nú standa menn og viðgerða henda persónin einsamallan, um hann hevur albogar ella ikki albogar og hvørt av sínum. Eg haldi, at tað er ósømiligt fyrí viðgerðina her á tingi og eg skal bara siga við Jørgen Thomsen, at óansæð hvussu týðandi maður, Poul Michelsen er, so er hann framvegis ein sjeyndingur av núverandi tingbólki fólkafloksins.

Hilmar Kass (sj.) Viðmerking

Harra formaður.

Lat meg beinanvegin siga, at eg taki undir við tí ætlan, sum er at gera undirsjóvartunnil vestur í Vágar, tað knýtur tað oynna heilt øðrvísi í samband við Streymoynna. Tá ið eg geri tað, so er tað tí, at tað sera skilagóða uppskot, vit høvdu, um at gera ferjulegu á Norðaru gjógv í sini tíð als ikki vann frama her á løgtingi, ti at vann tað frama, at samband kundu verið á Norðaru gjógv yvir á Oyragjógv í støðugari ferð, tá hevði lítið skil verið fíggjarligt at fari og gjørt undirsjóvartunnil, men tað var ikki meiriluti fyri tí. Menn gjørdu av, at gera eina ferjulegu heilt inni á Fjørð í Vestmanna soleiðis, at tað verður eitt langt strekki, vit skulu hava fleiri og dýr skip, um ferðasambandið, sum har er, skal røkjast til lítar.

Eitt annað, sum ógvuliga nógv kemur fram, tá ið vit tosa um flogvøll vesturi í Vágum ella ikki, tað, sum tykist at verða tað, sum liggur fremst i huga hjá monnum, tað Vágarnar. Eg eri púra samdur í, at vit eiga at hugsa um Vágarnar, men tað kann ikki verða ætlanin at spurningurin um, hvar ein flogvøllur skal liggja í Føroyum, um hann hevur heilt stóran týdning fyri landið sum soleiðis, at tá skulu vit bara hyggja at, hvussu hann kemur at ávirka eitt ávist øki. Eg havi sagt tað fyrr, eg frygti fyri, at tá ið tosað verður um, at vit

hava ikki ráð at gera ein nýggjan stóran flogvøll, sum kann taka flutningsflogfør, tað verður sagt, at vit hava ikki ráð til tað, tað var kanska serliga Jógvan Sundstein, sum segði tað, so kundi hent, at vit høvdu minni ráð at lata vera, tá ið vit hyggja upp á framtíðar sambandið og møguleikarnar til útflutning av fiski út av landinum.

Adolf Hansen (fr.)

Harra formaður.

Eg skal ikki leingja so nógv um hetta, men skal loyva mær at lesa eitt brot burtur úr her. Her stendur í viðmerkingunum, "hesir donsku ferðslumyndugleikarnir fáast í løtuni við at meta um, um nøkur framtíð er í Vága Floghavn". Tað eru púra greið boð, Poul Michelsen kemur við, hvat ið donsku flogferðslumyndugleikarnir fáast við, men tað eru jú teir donsku flogferðslumyndugleikarnir, sum avgera, um vit skulu byggja ella, um vit ikki skulu byggja, hvar vit skulu byggja, og nær vit skulu byggja, tað fáa vit ikki loyvi til at siga so nógv um. Men so stendur her, í tí fyrstu greinini, "eingin størri útbygging av Vága floghavn verður gjørd, fyrr enn henda inngongur í eina samlaða meting av framtíðarflogvøllí í Føroyum."

Eg fari at loyva mær at spyrja, harra formaður, hvat samanhang er í hesum her. Í viðmerkingunum sigur man tað, at tann játtandi myndugleikin er við at kanna tað, og so kemur hann við lóg um at banna tað. Vit kunnu ikki koma her við eini lóg um at byggja ein flogvøll í Vágum, líka so lítið kunnu vit koma við eini lóg um at banna tað. Vit hava nýliga viðtikið eina lóg um, hvussu tílíkt skal avgerast, og har kemur Føroya landsstýri inn sum heild, sum ein ráðgevandi stovnur hjá donsku loftferðslumyndugleikunum. Lesur man so grein 2, so stendur her, "undirsjóvartunnilin, ið er partur av hesi útbygging". Eg veit ikki um nakran undirsjóvartunnil, sum er partur av hesi útbygging, tann, sum skal vestur í Vágar er ikki partur av útbygging av flogvallarmálinum, tað er ikki tann undirsjóvartunnilin, sum talan er um her, tað

má vera ein annar, sum eigur at verða umfataður av hesi lóg. Eg hevði skilt tað, um tað stóð, at undirsjóvartunnilin, ið er partur av hesi útbygging, er umfataður av hesi lóg, so hevði eg skilt tað, hvør skal so avgera, um tað verður ella, tað ikki er? Hasin spurningurin stendur púra opin. Men tá ið man lesur hesi stykkini, tað eina, um man tekur navnið fyrst, har stendur, loysn av flogvallarspurninginum í Føroyum, also nú hava teir lógaruppskot um eina loysn, og so fara teir at leita eftir loysnini, hvar er loysnin? Eingin størri útbygging av Vága Floghavn, tað er íð hvussu so er ikki nøkur loysn, tað er tað øvugta av eini loysn nevnliga tað, at man steðgar øllum, og so stendur her, at undirsjóvartunnilin, hann skal eisini steðga, um tað er hann, ið teir har ætla, § 1 og § 2 í hesi lóg eru armóðstekin.

Eg var niðri í býráðssalinum, boðin sum ein "special guest" saman við m.ø. Svend Aage Ellefsen at síggja hesa ætlanina um flogvøllin á Glyvursnesi. Eg skal viðganga, at eg var ógvuliga hugtikin, og eg legði merki tíl, at Svend Aage Ellefsen var eisini ógvuliga hugtikin, hann segði ikki eitt orð í móti tí, eg haldi hann var "vilt imponeraður" fyri at brúka eina danska málbering, av hesum flogvøllinum. Nú kann Svend Aage gott grína at mær, hetta er ikki at grína at, tað var bara soleiðis.

Eg síggi eisini nakað stórt í at gera ein flogvøll her. Um tíðin er tann rætta, tað skal eg so lata verða ósagt. Tá ið man so sær hetta málið lagt fram, so fær man ta fatan, at maðurin, eg sigi maðurin, tí tað var bara ein maður aftan fyri flogvøllin á Glyvursnesi, og tað var Poul Michelsen, tað var eingin annar maður aftan fyri har, hvørki úr Javnaðarflokkinum ella Sjálvstýrisflokkinum ella nakrastaðni, tað var ein einasti "primus motor" í hasum har, tað var Poul Michelsen. Vit hava ikki hoyrt eitt annað navn nevnt í samband við flogvøllin á Glyvursnesi, ikki eitt, og tað var eingin annar aftanfyri. So kunnu teir koma og siga tað, at teirra menn stuðlaðu tað, tað var Poul Michelsen og eingin annar.

Man fær ta fatan, tá ið man lesur hesa lógina, at

hesin Poul Michelsen er bangin um eitt ella annað, helst bangin um, at tað møguliga kemur í gjøgnum við hesum flogvøllinum, og nú vil hann bjarga sær út úr hesum á ein ella annan hátt, tí leggur hann hetta uppskotið fyri tingið. Hetta er líkasum at avleiða tankarnar hjá fólki burtur frá hesum flogvølli har suðuri á Glyvursnesi.

Eg haldi, at tað er í lagi, at menn, valdir á ting, fáa loyvi til at brúka tingsins røðarapall til at koma við uppskotum, eisini um tað er ivasamt, um nakað álvara er aftan fyri tað, so er man nú eina ferð noyddur at taka við teimum.

Nú hevur verið nevnt eitt uppskot um at beina burtur. Her er ikki talan um at viðgera Poul Michelsen, sum Jógvan Stundstein hevur verið inni á, at tað er ikki Poul Michelsen, sum skal viðgerast, tað er yvirhøvur ikki talan um tað. Tað er talan um at viðgera eitt mál, eg vil siga eitt mál, sum ikki er í_samsvari við sítt egna navn, her stendur loysn av flogvallarspurninginum. hetta er ikki nøkur loysn, hetta er ein "avdemping" soleiðis, at menningin har er minst møguleg.

Nú veit eg ikki, hvørja nevnd, tað fer í, um nakar hevur skotið upp á samferðslunevndina, men eg skal skjóta upp, at tað fer til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð, tí tað er eingin grund til at senda tað aðrar staðir enn bara beinleiðis til 2. viðgerð og helst í kvøld.

Eyðun Videro (ff)

Harra formaður.

Vit hava fingið til viðgerðar í dag málið um flogferðslu í Føroyum, og vit eru klár yvir, at hetta er eitt rættiliga týðandi mál fyri Føroyar.

Hetta málið hevur verið frammi ofta fyrr, men vit ásanna í dag, at tað hevur fingið eina heilt serliga dimensión, tað er tað, at tað er gjørt til eitt partaflokspolitiskt mál, persónligt mál heldur enn spurningur um flogferðslu til og úr Føroyum, sum tað veruliga snýr seg um.

Hetta málið er lagt fram av løgtingsmanninum Poul

Michelsen, og sum formaður fólkafloksins Jógvan Sundstein hevur víst á, so stendur Poul Michelsen einsamallur aftan fyri hetta uppskotið. Flokkurin stendur ikki aftan fyri tað, og eingin av tingmonnum floksins í løtuni standa aftan fyri uppskotið hjá Poul Michelsen.

Vit kunnu taka og venda hesum málinum eitt sindur á ella hyggja at øðrum uppskotum, um ikki beinleiðis uppskot so tankar, sum hava verið frammi, sum beinleiðis viðvíkja hesum sama, men sum hóast tað ikki hava verið lagdir út á sama hátt sum hetta. Eg havi sjálvur havt frammi um, at útbygging av flogferðsluni í Føroyum átti at verið gjørt suðuri á Sandoynni, tí sambært tær kanningar, sum vit hava sæð, so er tað best hóskaða lendið í Føroyum til at leggja ein flogvøll. Eg havi skilt, at tað er eingin meiriluti aftan fyri tað í tinginum o.s.fr., men tað er eingin, sum hevur lagt meg undir tað, at eg vil avtofta Vágoynna.

Vit hava hoyrt reiðiliga týðuliga um, serliga frá Sambandsflokkinum, ella einstakir sambandsmenn hava víst á, at tað er rætt at gera flogvøllin inni á Skorhæddini. Teir úttala seg sum lokalir politikarar, einki ringt um tað, tað er eingin, sum hevur lagt teir undir, at teir vilja avtofta Vágoynna, um teir tosa um flogvøll inni í Eysturoynni, men nú er tað ein tingmaður, sum eitur Poul Michelsen, sum hevur mælt til, at vit skulu leggja ein flogvøll úti á Glyvursnesi, og nú verður tað gjørt um til tað, at tað er Fólkaflokkurin, sum vil avtofta Vágoynna, men tað er als ikki tað, talan er um, hetta er bara ein spurningur, hvat ið tingmenn vilja fáa burtur úr einum tilíkum máli fyri at skapa sær ein politiskan vinning heldur enn at tosa um málið, sum fyriliggur.

Viðvikjandi hesum eina partinum av uppskotinum hjá Poul Michelsen í tingmáli nr. 4 um undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi, har vita vit, at Poul Michelsen sjálvur hevur verið við til at samtykt hetta uppskotið, hann atkvøddi fyri tí í løgtinginum, men eg veit, at aftan á tað hevur Poul Michelsen sagt, at tá ið tað nú kemur fram, at undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi er ein partur av útbyggingini av flogvøllinum í Vágum, um tað er tað, sigur hann, so vil eg ikki verða við, tí eg

meini, tað er skeivt, at útbyggja flogvøllin í Vágum, tað er rættari at byggja hann á Glyvursnesi. Tað er ein ærlig støða at hava, og eg sigi hann ikki ringan um tað, og tað eru nógv mál staðbundin, sum vit aðrir tingmenn fyri okkara valdømi hava frammi uttan tað, at man ger tað fyri at royna at niðurleggja alt virksemið í einum øðrum valdømi.

Persónliga vil eg siga tað, at eg eri als ikki samdur við Poul Michelsen í hansara støðu í hesum málinum, als ikki. Eg vil taka fult undir við tí, sum formaður fólkaflokksins førdi fram, og eg vil halda tað eisini, at tað er nokk so óvanligt, at ein tingmaður leggur eitt tingmál fram um at forða eini útbygging í einum øðrum valdømi, tað er ógvuliga óvanligt, tað taki eg yvirhøvur ikki undir við.

Viðvíkjandi tingmáli nr. 5: Krøv um framtíðarflogvøll í Føroyum, so vita vit, sum tað eisini er ført fram, at eitt uppskot er samtykt í tinginum, uppskot til samtyktar frá tingmanninum Svend Aage Ellefsen um, at Løgtingið tekur til viðgerðar kanning av flogvallarviðurskiftunum í Føroyum. Tað uppskotið varð samtykt og beint í samferðslunevndina, sum varð gjørd til millumtinganevnd til at arbeiða víðari við málinum, hvørt málið er komið aftur nú, tað veit eg ikki, men eg veit, at táverandi formaðurin í nevndini Tordur Niclasen hevði vent sær til loftferðslumyndugleikarnar í Danmark og biðið um fund til at arbeiða víðari við málinum. Hvat ið hesin núverandi formaðurin Adolf Hansen hevur gjørt, tað veit eg ikki, men eg havi ikki frætt nakað aftur, og tí vil eg taka undir við tí, sum Jógvan Sundstein segði, at tingmál nr. 5 taka vit og beina saman við tí málinum, sum er í samferðslunnevndini um at kanna flogvallarviðurskiftini í Føroyum. Tingmáli nr. 4 kann eg als ikki taka undir við.

Takk fyri harra formaður.

Heini O. Heinesen (tf) viðmerking

Harra formaður.

Tað var líka eitt viðmerking til undanfarna røðara

Eyðun Viderø. Nú var tað soleiðis, hann sigur, at tað er heilt óvanligt, at ein tingmaður leggur eitt mál fyri tingið at forða eini útbygging, sum er samtykt. Hetta er ikki meira óvanligt enn tað, sum hendi við Skopunar havn í 1980, tá var ein útbygging samtykt har, og har var ein samgonga, sum forðaði tí útbygging. Tað vóru líka hasi orðini har.

Nú eru teir farnir at rokna Fólkaflokkin upp í einum sjeyndaparti, sum tekur undir við Poul Michelsen, og onkur roknar hann út í prosentum, nú veit eg ikki, hvat man kann brúka sum mál har, men eg vil ið hvussu er halda tað, um hinir fólkafloksmenninir í Suðurstreymoy ætla sær inn aftur, so rokni eg við, teir verða 3/7, um teir verða 3, kanska tað verður bara ein, so til næsta val verður tað bara 1/5. Tað var líka handa viðmerkingin har.

Eyðun Viderø (ff.) viðmerking

Tað var ein lítil viðmerking til tað, sum Heini O. Heinesen segði um samtykt frá 1980. Nú veit eg ikki, hvat hann sipar til har, ella hvussu hann meinar hatta, tí um løgtingið samtykkir at broyta eitt uppskot, sum fyriliggur, so vil tað ikki siga tað, at man sum so leggur uppskot fram um at forða eini útbygging, men at man ynskir eina broyting í tí, og at løgtingið samtykkir eina aðra útbygging enn ta, sum einaferð framman undan er samtykt. Tað er ein heilt annar spurningur heldur enn tað, at seta uppskot fram um at forða eini útbygging á einum stað. Tað er eitt ærligt mál, at man broytir eitt mál og ynskir tað øðrvisi loyst, har frá og so at forða einum, tað er heilt hvørt sítt mál.

Um vit taka hetta, at Poul Michelsen, háttvirdi tingmaður, sigur tað, at vit skulu ikki útbyggja meira í Vágum, tað er at forða Vágum. Nakað annað er tað, um nú løgtingið gjørdi eina aðra samtykt, har teir skulu broyta møguliga útbygging í Vágum, tað er ein heilt annar spurningur, tað kann ikki samanlíknast.

Tí meini eg, handa viðmerkingin hjá Heina O. Heinesen er heilt burtur, við sum so mangar av hansara viðmerkingum, sum hvørki hava - eg veit ikki, um eg havi

loyvi at siga - høvd olla hala.

Agnar Nielsen (sb) viðmerking

Tað var ein viðmerking til seinasta ærað røðara um hetta sama, at hann metti, tað var óvanligt av einum tingmanni at koma fram við uppskoti um at steðga einari samtykt. Eg vil siga, tað er ikki óvanligt hjá Fólkaflokkinum.

Svend Aage Ellefsen kom fram við einum uppskoti um at steðga útbyggingini í Vestmanna av ferjuleguni inni á Fjørð, tí at hann hevði eitt uppskot um, at ferjulega skuldi gerast á Norðarugjógv. Tað var samtykt á Føroya løgtingi, og hann vildi steðga útbyggingini, so hjá Fólkaflokkinum er tað ikki óvanligt, um man metir tað vera óvanligt hjá øðrum.

Heini O. Heinesen (tf) viðmerking

Harra formaður.

Tann broytingin, sum vit tosaðu um, var ein viðtøka, sum varð gjørd í samgonguni um Skopunar havn, sum sat áðrenn 1980. Hasa viðtøkuna kennir Eyðun Viderø sera væl, honum nýtist ikki at koma upp higar og siga, at tann broytingin er ikki farin fram.

Tann samgongan, sum tók við aftaná, tók og broytti ta útbyggingina. So vitt sum eg veit, so útbyggja teir eftir tí í dag. Kanska Eyðun kundi komið upp higar og sagt mær, hvørjum teir útbyggja eftir.

Atli Dam (jv) viðmerking

Harra formaður.

Tað var ein maður, sum fyri einum hálvum ári síðani segði við meg, at Fólkaflokkurin var ikki ein politiskur flokkur, hann var ein samgonga av eikultpersónum, sum høvdu hvør síni áhugamál, sum teir royndu at samskipa.

Nú byrjar, sum danskararnir siga, at "krakelere" eitt litið sindur, tá ið allur flokkurin mann av manni

fer upp at vaska sínar hendur og avnokta ein av partamonnunum. Man kann kanska siga, at tað tænir føroyskum politikki, at tað verður gjørt, men eg haldi, at tað er eitt lítið sindur undir tingsins sóma. Eg skal ikki forkleyna rættin hjá einumhvørjum tingmanni til at leggja uppskot fram, men tað er eitt lítið sindur at taka eitt stórmál so lættferdiga upp í viðgerðini, at man letur so markantar meiningar koma fram á ting og so brúka tingsins tíð mest sum til at koyra tað burtur aftur.

Tað kanska fær fólk at fáa eyguni upp fyri, at hetta spælið millum Jógvan við Keldu í Klaksvík og Poul Michelsen í Havn, millum Svend Aage Ellefsen í Vágum og Poul Michelsen í Havn, tað er liður í eini planlagdari strategi, sum gongur út upp á, at útvega sær nakrar atkvøður í einum konfrontatiónspolitikki.

Eg haldi, at vit skuldu fingið hetta her til viks skjótast gjørligt.

Jógvan Sundstein (ff) viðmerking

Harra formaður.

Hatta, sum háttvirdi løgmaður, segði har, hatta vísti bara tað heilt óvanliga, ódemokratiska sinnalag, sum hann hevur, og sum hann hevur víst eisini, tá ið vit taka hansara flokk.

Tað er soleiðis, at í Fólkaflokkinum hevur hvør persónur loyvi til at hava sína meining, og tað má verða soleiðis og er soleiðis í øllum demokratiskum londum, at ein og hvør politiskur flokkur er ein samgonga av øllum teimum persónum, sum stuðla viðkomandi flokk. Men innan fyri hin føroyska Javnaðarflokkin er tað soleiðis, at har er tað ein persónur, Jørgin Thomsen segði, at tað vóru 7/7 í Fólkaflokkinum, men í Javnaðarflokkinum har eru 8 persónar, men allir dansa eftir pípuni hjá 1/8 í tí flokkinum.

Hetta ódemokratiska intoleranta sinnalagið, sum Javnaðarflokkurin hevur víst og prógvað, og hevur nú í áravís sagt, at vit vilja ikki arbeiða saman við Fólkaflokkinum, hann er pest, Sambandsflokkurin er kolera og hvørt av sínum. Hetta vísir støðið í føroyskum poli-

tikki, og tað er tað, sum vit mugu koma burturúr og tí koma vit helst best burturúr, um Javnaðarflokkurin ikki verður í nakrari samgongu, einkl hevur at siga aftan á næstkomandi val.

Atli Dam (jv) viðmerking

Harra formaður.

Vit hoyrdu Tord Niclasen cinaferð fyrr í dag tosa um henda koyrilin, og vit hava sæð tað fullkomiliga manglandi jørðforbindilsi hjá Fólkaflokkinum hesi seinnu árini, hvar hann javnsetir tað, at ein flokkur, sum hevur havt framgongd við eitt val, ikki sleppur upp í part, sum manglandi demokrati. Tað er fult í tráð við ta demokratisku hugsjónina, at flokkar standa uttanfyrí, og flokkar standa innanfyri, tá man hevur samráðst seg líðugt.

Hetta orðaskiftið í dag avdúkar meira nakað annað eina spekulatión í einari ósemju. Í Javnaðarflokkinum hevur hvør maður sína meining, hann torir at standa við hana, men vit leggja tað ikki soleiðis til rættis, at vit spekulera í ósemjum fyri at fáa atkvøður burtur úr tí.

Jógvan Sundstein (ff) viðmerking

Harra formaður.

Tað er eitt orðatak, sum sigur, at tjóður trýr, at hvør maður stjelur. Um tað er nakar, sum spekulerar í taktikki, vita vit, at tað er Javnaðarflokkurin.

Hjá okkum er tað soleiðis, at vit yvirhøvur ikki spekulera í taktikki, tvørturímóti. Um vit gjørdu tað, so hevði Poul Michelsen aldri lagt hetta uppskotið fram. Hetta er eitt uppskot, sum hann hevur lagt fram sum sína persónligu meining eftir sínum yvirbevísningi, og tá ið vit taka støðu til hetta uppskotið, so er tað út frá okkara persónligu meining og okkara persónliga yvirbevísningi og ikki nøkur spekulatión.

Eg veit, at tað er soleiðis hjá Javnaðarflokkinum, har gongur tað út upp á taktikk, hvussu skulu vit gera

hetta, hvussu skulu vit klára hetta valstríðið o.s.fr.

Atli Dam (jv) viðmerking

Harra formaður.

Tað er loyvt hjá hvørjum einasta flokki at leggja taktikk, men tað er ikki so gott, tá ið taktikkurin verður avdúkaður.

At leggja ein taktikk og koma heilskapaður í gjøgnum og fáa eitt hampiligt val burtur úr og kunna fremja ein politikk, sum ein flokkur stendur fyri, tað haldi eg er ein partur av tí politiska spælinum.

So hetta orðatakið, at tjóður trýr, at hvør maður stjelur, haldi eg, at tað er fáur, sum hevur víst tað so væl, sum Fólkaflokkurin. Um man tekur tað organið, sum stendur fyri Fólkaflokkin, so er alt tað, sum kemur út í tað blaðið, út í propagandúna, vísir, at viðkomandi persónur, sum skrivar um misteinkiliggeran í samband við starvssetanir, um politiskar rossahandlar o.s.fr., sum hugsar so, at øll onnur, allir aðrir politikarar hugsa á sama lága støði. So har haldi eg, tað hevði verið rætt at sagt, at tjóður heldur, at hvør maður stjelur.

Eg haldi, at Javnaðarflokkurin hevur einki at skammast yvir, hann hevur verið í føroyskum politikki síðani 1928, tað eru 50 ár. Vit hava verið við uppi í leiðsluni av hesum samfelagnum í nógv ár. Tann politikkur, sum er førdur, hevur verið ein solidur politikkur, sum hevur gjørt tað betri hjá fólki at liva í hesum landinum, og tí taki eg mær hatta lætt hasar skuldsetingarnar um, at tjóður trýr, at hvør maður stjelur.

Svend Aage Ellefsen (ff.)

Harra formaður.

Fyri at taka hetta uppaftur, sum vit endaðu við við Atla Dam, so má tað standa tinginum púra greitt, serliga út frá tí framførslu, sum Atli Dam hevur sýnt her, at tað er taktikkurin hjá einum flokki, sum er avdúkaður, tað er taktikkurin hjá einum flokki í hesum málinum, sum er miseydnaður, og tað er taktikkurin hjá

hinum føroyska Javnaðarflokkinum. Tí er tað nakar politiskur flokkur, sum hevur roynt at koyra politikk upp í flogvallarviðurskiftini í Føroyum, so er tað Javnaðarflokkurin.

Vit hava innan fyri okkara flokk á sama hátt, sum t.d. innan fyri Sambandsflokkin, vit hava eitt uppskot frá Jóannes Martin Olsen og Jógvan Ingvard Olsen liggjandi ovast í hesi stóru rúgvuni við síðuna av okkum, sum viðvíkur flogvallarviðurskiftum. Eg trúgvi einki upp á, at tey uppskotini líka sum undirbyggja tað, at vit skulu varðveita flogvøllin har vesturi fyri allar tíðir. Heldur er tað hin vegin, at man vil venda aftur til hesa vælsignaðu Skorhæddina. Eg trúgvi ikki tí, at meðingmaður mín vestaneftir Ivan Johannesen gongur so gramliga inn fyri tí, sum teir føra fram.

Hetta meta vit í okkara flokki at vera eina náttúrliga gongd. Vit ganga út frá sum eina sjálvfylgju, at limir í okkara flokki, og ikki bara limir í okkara flokki, vilja ganga inn fyri at tryggja øllum medborgarum í hesum samfelagnum ein sjálvsagdan rætt til tað fría orðið, ein sjálvsagdan rætt til eina frælsa hugsan. Tað er tað, sum hevur givið útslag í hesum her, vit hava fingið endavent hesum her problematikkinum viðvíkjandi einum flogvølli á Glyvursnesi kontra vøllinum har vesturi.

Tórshavnar býráð hevur lagt nógvar pengar í fyri at undirbyggja og seta síni sjónarmið fram so væl sum møguligt. Men tað hevur eydnast okkum við greiðum orðum vestanífrá og íð hvussu so er frá fólkafloksins síðu uttan at blanda politikk uppí, íð hvussu so er í fyrsta umfari at vinna allan tingbólkin hjá Fólkaflokkinum fyri okkara sjónarmiðum, og vit fáa at siggja, hvussu støðan verður, tá íð tingmenn fyri Javnaðarflokkin og tá serliga sjálvsagt tingmenninir her, sum eru valdir í Suðurstreym, teir burdu havt áhuga fyri hesum flogvallarmálinum, men tað vísir seg hvørja ta einastu ferð, tá íð flogvallarviðurskiftini eru til viðgerðar her í tinginum, tá eru teir burtur.

Eg loyvdi mær, tá íð loftferðslulógin var til viðgerðar her í tinginum, áðrenn tingið fór í summarfrí, at

seta fram uppskot um at steðga flogvøllinum á Glyvursnesi. Tað var ikki talan um, at nakar av tingmanningini hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy atkvøddi fyri, nei, hvar vóru teir tá? Teir vóru ikki inni í tingsalinum, eingin uttan Jona Henriksen, sum nú ikki stillar uppaftur, men hennara svar var, "eg atkvøði ikki".

Nei, er tað nakar, sum hevur roynt at koyra politikk upp í flogvallarmálið, so er tað Javnaðarflokkurin, tað hevur alt Føroya fólk sæð, og tað eru øll Føroya fólk greið yvir. Politikkur er politikkur, eg haldi, at tað er rættiliga náttúrligt í minari verð, at man ger tað, men tá ið man ger tað við beráddum huga, so skal man ikki loyva sær soleiðis, sum Atli Dam, tá ið sinnið fer av stað við honum, gjørdi nú at koma upp higar og brigsla Fólkaflokkinum fyri, at bryggja atkvøðugreyt saman í hesum málinum. Tað hava vit ikki gjørt, og tað má ein og hvør tingmaður skilja. Eg kann vera góður samráðingarmaður, eg kann vera góður agitator, eg kann vera góður at sannføra fólk um tær áskoðanir, sum eg havi um ymisk mál, men eg hevði ongantíð fingið Poul Michelsen at lagt hesi bæði uppskotini fram í móti restini av tingbólkinum, tað haldi eg, ein og hvør kann skilja.

Eg má síga, at eg sjálvsagt havi okkara áhugamál at verja, og eg eri ómetaliga glaður fyri ta støðuna, sum eg standi í í kvøld vegna okkara valdømi har vesturi, tí vit hava fingið forsprákaran fyri Glyvursnesætlanini at leggja eitt uppskot fram í løgtingið, vit hava ikki fingið hann, men hann hevur gjørt tað, óklókt er tað, tað skerst ikki burtur, tí tað kemur at vísa seg, at vit hava fingið ikki bara Fólkaflokkin við, men ið hvussu er, um teir, sum ikki enn hava torað at úttala seg um málið, koma at atkvøða soleiðis, sum teir hava látist at vilja, so fellur uppskotið við einum braki, t.v.s., at Føroya løgting, ið hvussu so er, hevur felt eitt uppskot um at steðga øllum størri útbyggingum við flogvøllin í Vágum.

Tað meini eg, er ein sera positiv støða hjá okkum vestan eftir at kunna fara inn í eitt valskeið og ið hvussu er undir komandi samráðingum at vísa á, at tað hevur verið eitt uppskot til viðgerðar á Føroya løgtingi

um at steðga øllum størri útbyggingum vesturi í Vágum, og tað varð felt við eitt brak, ið hvussu er, var tað eingin í Fólkaflokkinum, sum tók undir við tí uttan tann, sum setti uppskotið fram. Tað má tá vera ein veldugа góð útgangsposition hjá okkum at hava aftan á komandi val. Eg hugsi, um man skal koma inn á tað valtaktiska, so vil eg siga tað, at Fólkaflokkurin í Vágum, ið hvussu er í flogvallarmálinum stendur rættiliga væl, og eg trúgvi ikki, at Poul Michelsen hevði, skulu vit siga, latið seg yvirtala av mær til at komið fram við hesum her, men lat tað fara.

Viðvíkjandi tingmáli nr. 5, sum er meira tekniskt mál, sum hinir frá okkara flokki, ið hava havt orðið, hava mælt til, at tað kann fara til nevndarviðgerð, vil eg siga, at eg havi einki í móti, at hetta málið fer til nevndarviðgerð. Tað sigur, at ein framtíðarflogvøllum í Føroyum skal lúka ávís krøv. Tað eru nokk krøv, sum tær ætlanir, sum eru gjørdar viðvíkjandi vøllinum á Glyvursnesi, kunnu lúka, men bert um teir fáa undantaksloyvi frá ávísum reglum í ICAO ásetingunum, so kunnu teir koma upp í hesar kategoriirnar og hesar kodurnar ella, hvat tað nú kallast.

Vit hava einki í móti at kanna tey viðurskiftini, eg havi so einki í móti, at tað verður kannað, og at øll mál, sum viðvíkja flogvallarviðurskiftunum í Føroyum, eiga at standa greið fyri almenninginum, tey eiga at standa greið fyri løgtinginum, tað er greitt. Tað eigur einki at verða krógvað burtur. Tí havi eg avgjørt einki í móti, at hesi málini verða viðgjørd, um tað skal verða.

Eg veit, tað er heldur eingin loyna, at flogvøllurin í Vágum lúkar ikki tey somu krøvini, sum tað verður boðað um her, tað ger hann ikki, og tað fæst hann helst heldur ikki til. So er tað, man sigur, at tá ið umstøðurnar eru soleiðis, sum tær eru á Vágum, so taka vit ávís fyrivarni í teimum loyvunum, t.d. vil tað nokk verða soleiðis, at man á Glyvursnesi kann lenda í einum sýni upp til 200 m, men í Vágum krevjast 300 m. Tað er bara so, tað kunnu vit nokk ikki broyta nakað serligt uppá, tí at myndugleikarnir siga, um vit geva loyvi til

innflúgving til Vágarnar í einum sýni, sum er undir 300 m., ja so taka vit eitt risiko, og tað vil man ikki gera, úrslitið er tað, at vit kanska fáa ein dag um árið ella ein dag annað hvørt ár, hvar ið. tað ikki er lendandi í Vágum og tað kanska hevði verið lendandi á Glyvurnesi.

So er tað vit siga har vestani í frá, skulu vit 45 ella 47 túsund menniskju, sum liva á hesum klettinum gera eina íløgu upp á 1 mia. kr. til at vinna ein dag annað hvørt ár ella, skulu vit ikki. Har ið hvussu so er, eru vit 100% samførd um, so leingi sum málið ikki verður órógva av ávísum flokkum, sum lata tær politisku interessurnar fara fram um sakligheitina, so leingi eru vit vís í, at vit varðveita flogvøllin vesturi í Vágum, men skulu vit hava javnaðarflokkin til at svansa í hesum her scleiðis, sum Sverre Midjord var inní á í sínum uppleggi, hvar ið hann kom inn á atkvøðuspurningar o.s.fr., tingsessir, sum Atli Dam var inni á og í den dur, so víta vit ikki, hvar ið vit enda við vøllinum, og vit vita ikki, hvar vita enda í so nógvum øðrum málum, sum vit hava sað undir hesi her samgonguni serliga, hvar vit hava havt 17 mans og hvør einstakur hevur kunnað spælt við musklunum fyri at bjarga sær nakrar 100 mió. til sítt valdøni.

Vit har vestani frá, vit eru ikki bangin fyri, at flogvallarviðurskiftini í Føroyum fáa eina gjølliga viðgerð so leingi, sum man letur sakligheitina ráða, so leingi, sum man setur spurningar fram viðv. fíggjarviðurskiftum, um tað eru samfelagsbúskaparligur vinningur ella hall í tí íløguni, sum man atlar sær at gera o.s.fr., tí man vil hvørja ta einastu fer koma til eitt roknistykki, sum sigur, tað lønar seg ikki samfelags búðskaparliga, at gera annan flogvøll í Føroyum. Tað er rætt, at tað varð gjørt eitt veldugt arbeiði í 1973. Tað liggur ein so tjúk mappa av tilfari frá 1973, sum sigur, at tað búskaparliga lønar seg at gera ein flogvøll á Glyvurnesi, og tað var ein rætt niðustøða at koma til soleiðis, sum umstøðurnar vóru í 1973. Síðan 1973 er flogvøllurin í Vágum longdur, síðan 1973 hava vit fingið innflúgvingartól, sum minkaðu realtitetin frá 30% og

niður í 2 til 3% árliga, soleiðis, at tá man í dag fer at gera tað roknistykkið og serliga aftan á, at vit hava fingið tað fasta sambandið undir Vestmannasundi, sum fólkaflokkurin einmælt saman við teimum 31 tingmonnunum, sum vóru staddir í tingsalinum, tá atkvøtt varð, tók undir við. So vil man, tá man gerð tað rokninstykki ongantíð koma til eitt úrslit, sum sigur, at tað lønar seg at gera eina nýggja floghavn í Føroyum. Tað eru hasi har viðurskiftini, ið vit í hesum spurninginum hava ført fram, ið hvussu so er eg í mínum lagi.

Tað hevur bara víst seg, sum eg havi ført fram, at tað hevur verið størri áhugi innan fyri javnaðarflokkin at blanda politikk uppí, og sum Atli Dam var inni á í áðni, at bjarga sær einum tingmanni afturat burtur úr hesum málinum, um tað so skuldi kosta vágafólki flogvøllin ella ikki, tað legði hann einki í. Tí hevur hann latið býráðið her í Havn svansað runt til ríkismyndugleikarnar niðrí í København, til íslendska flogfartministeriið o.s.fr., meðan hann sjálvur hevur umsitið okkara uttanríkisviðurskiftir. Tí hava teir latið Tórshavnar býráð brúkt hópin av pengum, tí at hesum pengunum, sum Havnar borgarar nú skulu gjalda, hevði hann lítlan áhuga fyri, um so var, at tær krónurnar kundu bjarga javnaðarflokkinum ein tingmann, so var tað í lagi. Hatta er spælið, sum Atli Dam hevur ført hesi her seinastu trý árini í flogvallarspurninginum. Hann hevur latið okkara samfelag bløtt milliónir av kr. fyri at bjarga javnaðarflokkinum ein tingmann vesturí í Vágum.

Nú standa vit her og alt tað heila fellur á gólvið, tí tað vísir seg, at tað er ein samdur tingbólkur hjá fólkaflokkinum soleiðis sum Útvarpið so klárt og greitt í kvøld referaði tað út fyri Føroya fólki, sum ikki tekur undir við uppskotinum hjá Poul Michelsen um at stegða undirsjóvartunnlinum og útbygging við flogvøllin vesturi í vágum.

Eg skilji væl Atla Dam, at hann kennir seg eitt sindur upp østan og brigdar Fólkaflokkinum, sum Jógvan Sundstein segði: tjóður trýr, at hvør maður stjelur. Hetta liggur í menniskjanum, og tað er natúrligt, at tað eina sovorðna stund spríkir fram, tá í ein kemur at

standa soleiðis, sum Atli Dam stóð.

Tað var Lasse Klein, landsstýrismaður, sum var her uppi og segði, at Sjálvstýrisflokkurin var í móti flogvøllinum á Glyvurnesi. Hann var løtu seinni fylgdur upp av sínum floksformanni, sum sigur, at hann fult og heilt gongur inn fyri flogvøllinum á Glyvurnesi. Toppkandidaturin hjá honum her í Suðurstreymoy Ronald Poulsen, hevur meira enn einaferð hesar seinstu 2 til 3 mánaðirnar verið í útvarpinum og sagt sína áskoðan um hasi viðurskiftini, og hevur tað, sum hann hevur sagt, ikki verið til frama fyri flogvøllin í Vágum.

Atli Dam (jv.) viðmerking.

Harra formaður

Tað er nokk so nógv fyri í løgtinginum at skula hoyra ein fólkafloksmann tosa um svans. Mangt skal man hoyra, áðrenn oyrini fall av, er eitt orðatak.

Eg haldi, tað er upp á sítt pláss at vísa, at í politikki má man hava ein ávísan logik, tað má verða ein ávís linja og eitt ávíst samsvar, men hann stendur her og sigur, ein samdur Fólkaflokkur tekur undir við at boykotta uppskotið hjá Poul Michelsen, hvar er tann samdi Fólkaflokkkurin tá? Eg haldi, hatta er eitt fantastisk útalilsi. Eg haldi, tað er lítið upp á sítt pláss eitt kvøld sum í kvøld við ógvuliga fáum áhoyrarum at royna at sannføra tingmenn um tað, sum hann sjálvur, sum hann sannføra vágamenn um fyri fáum døgum síðani, tá ið hann sigur, at veri eg valdur og tað óivað ógvuliga týdningarmikið fyri flogvøllin, so skal eg spæla við musklunum, tí veri eg 17. maður, so verður eingin flogvøllur í Havn, og so standa og briksla øðrum, at teir royna at reka ein politikk, sum skal tryggja teimum ein mann. Har er tað, eg vísti á tað kvøldið at, tað er so ómetalig lítil útlit fyri, at Fólkaflokkurin fær høvi til at verða 17. maður og specilet Svend Aage Ellefsen. Hvar er sakligheitin í hesum, ta man stendur her og brigdar øðrum tað, sum ein sjálvur hátíðarliga hevur givið vágamonnum lifti um at gera.

Jørgen Thomsen (jv.) viðmerking

Harra formaður

Eg vil bara taka aftur í aftur tað sama, sum eg segði í áðni.

Nú stóð Svend Aage her og, ein kann ikki siga, tað var nøkur saklig røða, og tað var so langt burturfrá, men tað stendur, ið hvussu so er rimmar fast, at formaðurin fyri tingbólk fólkafloksins ella formaðurin í Fólkaflokkinum stóð her og segði, at Fólkaflokkurin tók undir, og hvar er so sjeyndaparturin? Hann er í móti, tað vil siga tað sama sum at formaðurin kann ongantíð siga í veruleikanum, hvat hesin flokkur vil, tað er nokk so ringt tá at taka ein flok fýri fult.

Lasse Klein (sj.) viðmerking

Harra formaður

Tað er Svend Aage Ellefsen so ógvuliga likt at venda og snara tí, sum sagt verður, tað er skilligt, at tað er ræðsla á Svend Aage Ellefsen, tí tað, sum hann hevur ført fram her, ið hvussu so er ein partur av tí, er als ikki samsvarandi veruleikanum. Tað, sum sagt varð í áðni, var er at umboð sjálvstýrisfloksins í býráðnum tekur ikki undir við, at Poul Michelsen leggur hetta uppskotið fyri løgtingið, tað er sagt klárt og týðuliga. Hetta hevur hann gjørt uttan um sínar samstarvsfelagar, og tað, haldi eg, er ósømiligt, ið hvussu so er sæð út frá mínum sjónarmiði.

Svend Aage Ellefsen (ff.) viðmerking

Harra formaður

Hatta var nokk so løgið. Tann æraði landsstýrismaðurin Lasse Klein, heldur tað verða løgið, at Poul Michelsen kemur og leggur eitt uppskot fyri løgtingið uttan at hava spurt sínar samgongumenn í býráðnum um loyvi, hatta skal eg ikki kommentera. Eg haldi tað ikki verða so løgið, hann kann ikki hvørja fer hann skal leggja eitt uppskot fyri løgtingið, spyrja býráðið

eftir.

Tað sum eg hugsaði mær at gera eina viðmerking til, tað var Jørgen Thomsen. Atli Dam koyrdi á sama lága støði, sum hann gjørdi í áðni við sínum viðmerkingum, tað skal eg als ikki kommentera, men tá ið Jørgen Thomsen líkasum vildi siga at formaðurin í Fólkaflokkinum ongantíð kann siga, hvørja støðu Fólkaflokkurin hevur og líkasum dróg tað konklutiónina út frá tí, sum hann annars førdi fram, so vil eg síga, tað er ikki rætt. Tí um Jørgin Thomsen hyggur eftir gerðabókini fyri tann fundin, tá ið undirsjóvartunnilin um Vestmannasund varð samtyktur, so vil hann siggja, at tað vóru 31 atkvøður fyri málinum, og ein ávísur tingmaður var burtur, hann var ikki úr okkara flokki.

Tað var ein samdur Fólkaflokkur, sum tók undir við tí málinum, men sjálvsagt kann Jógvan Sundstein ikki fara og siga at hesir her 7 menninir fara í alla tíð líka mikið, hvørja psykiska ávirkan, teir annars koma undir í framtíðini, at standa við hesa støðuna, sum teir hava. Tað kunnu verða ávís viðurskiftir, sum fáa teir at broyta, eg meini, vit eru sjálvstøðug individ, harra formaður, eg hugsi mínar tankar, Anfinn Kallsberg hugsar sínar og so víðari í okkara flokki, tað er soleiðis. Vit ganga ikki og hugsa tankarnar hjá Jógvani Sundsteir soleiðis, sum Jørgen Thomsen óivað ger við tankarnar hjá Atla Dam og Tummasi Arabo, eg skilji ikki, hvussu teir klára hettar her, tað má eg siga.

<u>Heini O. Heinesen</u> (tf.) viðmerking

Harra formaður,

Mær tykir, hetta orðaskiftið liggur á einum nokk so lágum støði. Menn eru nokk so illir nú, og hvør reklarmerar sum mest, men nú vita, at rokningin upp á reklamuna fyri ávísa mannirum, hevur kostað 12 mió.kr. Tað, sum uppskotini ganga út uppá, er, at fáa allar føroyingar at gjalda hesar 12 mió.kr. og síðan at gjalda kanska 2 mia.kr. oman á til ein flogvøll, tað er tað, sum tað gongur út upp á.

Tá nú Svend Aage Ellefsen trýr, allir Suðurstreym-

oyingar ganga in fyri einum flogvølli sum liggur tætt við Havnina, hvar ið man flýgur yvir Havnini fleiri ferðir um dagin, so trúgvi eg, at Svend Aage Ellefsen tekur feil, tað trúgvi eg næstan, tí vit vita, hvat ið hendi niðri í Týsklandi, hvar íð 50 menniskju vóru dey, av tí at tey vóru dottin niður yvir tey fólkini, sum vóru áskoðarar.

Havnarborgarar verða áskoðarar til alla innflúgving til Føroyar hereftir, um Fólkaflokkurin hevur makt, sum hann hevur agt, og so eitt orð aftrat, sum hann nevndi har, hann segði, at Poul Michelsen letur seg ikki yvirtala av honum, tað eri eg heilt greiðir yvir, eg haldi ikki, at eg skal leingja so nógv um hetta aftrat, tað kundi verið nógv annað at rivið í.

Vilhelm Johannesen (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Hetta er við at gerast skemtiligt tykist mær. Tað hevur í nøkur ár verið soleiðis, at ein ávísur fólkafloksmaður, hevur lagt seg rættiliga langt út til høgru í politikki, og tá ið tað galt um hjá Fólkaflokkinum at bjarga teimum atkvøðunum, sum lógu nærri miðjuni, so segði man bara, hatta er bara Óli, hatta er ikki bara Poul, hatta er ikki Fólkaflokkurin.

Nú í dag, tá vit hava hetta uppskotið, siga summir menn, hatta er bara Poul, hatta er ikki Fólkaflokkurin.

Tann, sum hevði orðið her seinast, var ikki Fólkaflokkurin, tað var bara Svend Aage og soleiðis heldur man fram. Tá man so sigur hetta, so siga teir, at Fólkaflokkurin er ein demokratiskur flokur, men hvar er demokratiið tá ein av hesum monnunum, nevnliga seinasti ærði røðari mótmælir, at ein framsýning verður í Norðurlandahúsinum, er tað demotrati? Ella tá hann brigdar sitandi landsstýri, at Tórshavnar kommuna hevur fingið loyvi ella er sloppin at gera kanningar, er tað demokrati? Skuldi landsstýrið nokta eini kommunu at gera kanningar?

So sigur hesin røðarin, at tað lønar seg ikki samfelagsbúskaparliga at gera henda flogvøllin, hann tosar

um eina til tvær milliardir, tað kemur at kosta, men kan ein flokkur standa so spjaddur einum so stórum og týðandi máli, helst tað kostnaðarmiklasta málið, sum nakrantíð hevur verið frammi í Føroya søgu.

Tað hevr verið nevnt, at vit, m.a. Javnaðarflokkurin, vilja hava Fólkaflokkin uttan fyrí eina og hvørja samgongu, men eg haldi, tað verða óneyðugt hjá okkum øðrum at halda Fólkaflokkin uttan fyri, tað kemur av sær sjálvum.

Hugsi tykkum nú, at triggir flokkar sita og samráðast um at skipa eina samgongu. Tá flokkarnir eru samdir, skal Jógvan Sundstein út at vita, hvat sigur Óli, hvat sigur Poul, hvat sigur Svend Aage, um hann verður her tá, ella hvat sigur Jógvan við Kelðu ella Anfinn Kallsberg, tað er nokk soleiðis tað hongur saman, so tað tekur væl 1 ár, at skipa ta samgonguna, sum Fólkaflokkurin skal uppí.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað var okkurt, sum síðsti æraði talarar førdi fram.

Vilhelm Johannesen helt tað verða løgið, at Svend Aage Ellefsen hevði mótmælt eini framsýning. Tað er væl rætturin hjá einum borgara her í samfelagnum, at siga, sína áskoðan um rættin hjá einum øðrum stovni ella, hvat ta skal verða, at hava eina framsýnig, tað er púra rætt tað er ikki óvanligt undir hesum landssýrisskeiði, at kommunur fáa noktilsi fæyri bæði einum og øðrum, tað hava vit upplivað.

Tað, sum ikki hevur verið tosað so nógv um, er støðan hjá Javnaðarflokkinum ikki júst her tí taktiskt vita vit, at Javnaðarflokkurin skal hava ein tingmann í Vágum, vit hava eisini sæð myndirnar í Sosialinum, hvør hann er, og eg vóni, at tit eru nøgdir við hann, um hann kemur. Tit eru slopnir rættiliga væl undan, kjakið um Javnaðarfloksins støðu til flogvøll á Glyvursnesi í Tórshavnar býráð haldi eg tí har hava vit tað støðu, at Javnaðarflokkin ber kappan á báðum økslum, tit hava enn-

tá ein lim í flogvllarnevndini, sum eg ikki havi hoyrt orð ella eið um í tey ár, sum hetta mál hevur verið uppi. So hava vit ein annan rættiliga harðmæltan býráðslim, sum umboðar Javnaðarflokkin, sum hevur sett seg í móti hesum flogvølli, og Javnaðarflokkurin skuldi ikki verið so frammandur fyri hesum, eini slíkari tvistøðu, sum flokkurin her inni letur til at hava her í einum slíkum máli, sum hasum.

Hetta er eitt viðbrekið mál, hetta er eitt mál við spreingistoffi í, og tingmenn vilja appulera til nakað av tí mest tápiliga í veljarafjøldini, nevnliga ikki lokal patriotiskmu, men lokalidiotismu og vit hava ríkiligt, av slíkum tingmonnum her inni meira í øðrum flokkum, haldi eg sjálvur mangan, enn í Fólkaflokkinum. Haldið bara fram, antin tit hava 15.000 borgarar aftan fyri tykkum ella 10.000 veljarar ella 2.000 veljarar, haldið bara fram, tað endar helst við tí, at menn ganga runt og kannað blóðtypur, húðalit og hvørt av sínum. Hatta slagið av politikki og tit sansa milliardina, tað er í lagi, gerið bara tað, men vit hava upplivað hatta slagið av politikki, og tað sær út til, at tað eisini fer at verða rættiliga dominerandi faktor til hetta komandi valið.

Vit hava higartil í Suðurstreymoy kanska kunna brosað burtur øðrumegin við tankan um ta politisku mannagongd, sum Asbjørn Joensen hevur havt. Tað hevur líkasum vist seg, at verið gott latin í tí valdømi, sum hann kemur frá, og hví skal tað ikki tað. Tað vísir seg at verða frálíkt, og tað vísir seg at verða aðalmálið í júst hesum tingmálinum, sum vit hava til viðgerðar nú, tað er bara ein apellur til lokalidiotini í fólki. Eg meini so við, her ganga fólk og klassifisera hvønn annan sum góð havnarfólk, annað hvørt fólk flutti ikki til Havnar fyrr enn í fjør, tosa suðuroyarmál, tosa norðoyamál, men tað eru kreteriir, sum vanliga ikki hava verið uppi í politikki, antin tú hevur búð í Havn síðan í fjør ella tú flutti inn í gjár, ella um omma tín var úr Havn, men tað vísir seg nú, at vera vorðin ein politisk dygd.

Formaðurin

Tað eru tríggjar viðmerkingar tað er biðið um, also seinasti viðmerkjari hevði nokk einki at siga um málið, sum er framlagt og tað verða hesar triggjar viðmerkingarnar aftrat, so verður skotið upp, at umrøðan av hesum málinum endar, tí tað tykist sum um, at menn hava gloymt, hvat málið snýr seg um.

Henrik Old (jv.) viðmerking

Harra formaður

Nú er tað so langt síðan, at eg hevði næstan gloymt, hvat tað var, ið málið snúði seg um.

Tað gongur nokk so skilliga fram her, at tað er jú komið panikkur í ein flokk. Eg má siga tað, at tað hevur verið áhugavert hesi árini at verið her, og lurta eftir, hvussu menn hava viðgjørt hetta flogmálið.

Javnaðarflokkurin hevur mær vitandi ongantíð lagt nakað uppskot fram um at steðga flogvøllinum vesturi í Vágunum, hví ið hetta júst nú skuldi tørna so út, at tað varð Javnaðarflokkurin, sum var úti eftir hesum.

Eg haldi, tað má viðgerast sum eitt mál, sum ein Lingmaður hjá Fólkaflokkinum hevur lagt fram, um eg ikki havi misfatað tað fullkomiliga so, at tað knappliga skuldi verða Javnaðarflokkurin sum legði tað fram.

Álitini hava verið nógv, tveir sambandsmenn úr Eysturoynni hava roynt at trivið í ein flogvøll har, tað haldi eg verða mest sum fyri ein viðfáning, men at Javnaðarflokkurin skal knappliga verða tað stóra problemið í hesum flogvallamálinum, tað dugi eg bara ikki at fata. Eg haldi teir flestu hava roynt at tagt og latið fólkafloksmenninir innanhýsis striðast um hetta. Er tað nakað, sum hevur verið áhugavert hesi árini so hevur tað verið innanhýsis striðið i Fólkaflokkinum um flogmál, tað hevur dominerað hetta orðaskiftið i "den grad". Takk fyri.

Svend Aage Ellefsen (ff.) viðmerking.

Harra formaður

Eg skilji, at Henrik Old og eg eru púra samdir, tá hann sigur, tað er komið panikkur í ein flokk, eg rokni bara við, at tað var Javnaðarflokkin, hann hugsaði um í sambond við hasi orðini.

Annars ætlaði eg at gera eina viðmerking til nevnliga hetta, sum Vilhelm Johannesen kom inn á, tá hann undrandi spurdi út í tingsalin, um, tá ið Jógvan Sundstein hevur samráðst seg fram til eina samgongu, skal hann so fara út og spyrja Svend Aage Ellefsen og Poul Michelsen og Óla Breckmann, Anfinn Kallsberg og Jógvan við Keldu, skal hann fara og spyrja teir um hetta? Eg má siga tað, tað er ein fantastiskur munur í millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin, hann er nógv størri enn, hvat ið eg hevði roknað við, also sjálvsagt, tað skuldi bara mangla, vildi eg sagt, vit, sum skulu bera hesa komandi samgonguna uppi, skulu vit ikki verða eftirspurdir? Hatta er nevnliga tað sentrala, sum er munurin í millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin, og so nevnliga hendan mannin, sum Henrik Old og allir royna at forkleina.

Mær tykir so hjartaliga synd í býráðsliminum Leivi á Skála, her hevur hann loyvt sær, at havt sína egnu meining um flogvallarviðurskiftini, hevur meldað seg inn í kanningarnevdina, flogvallarnevndina hjá Tórshavnar býráð, óvitandi um, at hann skuldi ikki meina tað, sum hann meinti, tí tað var ikki sambærligt við tað, sum leiðslan í Javnaðarflokkinum meinar, og so verður hann so kúlaður niður alla staðni frá. Eg má siga tað, at hatta er ið hvussu so er ein skipan, og tað er sjálvandi tað teir stremba fram í móti sosialistarnir, demokratiskir sosialistar ella ikki demokratiskir, tað er hetta her - ha - bigg boss, tað týðir, hann meinar.

Asbjørn Joensen (sj)

Harra formaður.

Eg skal ikki dylja fyri, at tað var háttvirdi

tingmaður Óli Breckmann, sum animeraði meg til at koma upp her.

Eg skilti á honum, at eg stóð sum eksponentur fyri tí lokalpatriotiska veinginum sum er í tinginum, og eg vildi ynskt, at hann var eitt sindur meira at sær komin, meira búgvin, betri mannaður, so høvdu vit fingið eitt væl betri samfelag, eitt samfelag, sum var nógv meira "farlig aspektur" í enn, tað er nú.

Eg havi roynt at tagt í hesum málinum, og eg havi ikki verið keddur av at gjørt tað, men eg havi lýtt á, og tað, sum eg havi hoyrt hevur skuffað meg heilt fantastiska nógv, tað má eg siga.

Her er uppskot komið á borðið frá einum tingmanni úr Fólkaflokkinum. Tað kom týðuliga fram beinanvegin, at tað, sum tað snúði seg um í hesi atløgu, var, nú hesin tingmaður var burtur, at royna at fáa sum frægast burtur úr soleiðis, at hann kundi isolerast í hesum selskapinum her, at Fólkaflokkurin stóð massivur aftan fyri umboðið í Vágum. OK, tað er ein ærlig søk, men tað sum liggur í hesum málinum fyri mítt viðkomandi, er tað, at tað hevur verið ført fram, at tað er neyðugt við einum nýggjum flogvølli í Føroyum, tí at tryggleikin ikki er nóg góður vesturi í Vágum. Eg havi ikki hoyrt eitt tað einasta klókt seriøst orð tosað um hetta. Tað hevur verið ein ábending um, hvør flokkur skal bjarga sær mest burtur úr hesum her á ein ella annan máta, og eg haldi tað er ógvuliga skuffandi, at hetta skal verða niðurstøðan í einum sovorðnum kjaki. Tí uttan mun til, um Poul Michelsen er fólkafloksmaður, uttan mun til um hann markerar seg her sum ein stórur lokalpatriotur hóast alt limur í Fólkaflokkinum, og pástendur at fólkamongdin er her og tí er heilt rímuligt og alt hetta her. So liggur aftan fyri málið og uppskotið, at tað er trygdin, tað snúði seg um plus nakað av konversiellum. Tað við trygdini hevur verið á tingborði fyrr.

Eg havi sitið vesturi í Vágum og hoyrt menn diskutera trupulleikan, eg havi ikki hoyrt ein tann einasta eina mukka um hesi viðurskiftini, ikki ein, og eg skal eg heldur ikki gera tað, eg skal avgjørt ikki leingja hetta orðaskiftið í so máta, men eg vil bara gera vart

við, at vit eiga ikki at undirmeta hatta spekti við í hesum málinum soleiðis, at tað bara verður eitt kjak ímillum hvør flokkur er mest at sær komin og hvør klárar tingini best, og hvør klárar tey ringast. So eg má siga, at eg taki undir við formanninum, tá man sigur, at hetta orðaskiftið skuldi verið brotið av fyri langt síðani um tað var rætt, tí hetta kjakið her hetta hevur einki sum helst við tað grundleggjandi í uppskotinum at gera. Takk fyri.

Formaðurin

So eru tað ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað.

Er nakað uppskot um nevnd komið í hesum málinum? Kanska ikki komnir so langt heldur.

Jógvan Sundstein (sf.)

Um formæðurin lurtaði eftir, tá eg hevði orðið fyrstu ferð, so skjeyt eg upp, at tingmál nr. 5 fór í samferðslunevndina. Eg havi einki uppskot um hitt málið, um tað skal í samferðslunevndina ella, tað skal fara uttan nevndarviðgerð. Eg kundi hugsað mær, at tað seinna uppskotið fór til 2. viðgerð.

Formaðurin

So verða bæði uppskotini beind til viðgerðar í samferðslunevndini.

Nú fær Jógvan I. Olsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 23: Metingar í samband við bygging av nýggjum flogvølli í Føroyum.

Jógvan I. Olsen (sb.)

Harra formaður.

Tað er best at halda seg innan fyri sama øki longst møguligt. Tað eru Jóhannes Martin Olsen og eg sjálvur, sum leggja fram eitt uppskot, sum eitur:

Metingar i samband við bygging av nýggjum flogvølli í Føroyum. Í viðmerkingunum verður sagt, at spurningurin um framtíðarflogvøll hevur verið nógv frammi seinastu tíðina, men er orðaskiftið komið í tað tronga spor, at annahvørt er tað Vágarnar ella Glyvursnes. Vist kann verða á, at loftferðslumálaráðið hevur gjørt eitt stórt kanningararbeiði fyri at finna besta plássið til at byggja framtíðarfloghavn í Føroyum á, og eru teir komnir til tað úrslit, at tað hvørki er í Vágum ella á Glyvursnesi soleiðis, sum niðurstøðurnar av kanningunum frá 1963 og 1970 visa. So kemur ein konklutión, sum er tikin burtur úr hesi bókini, og hon er á donskum, eg fari at biðja um loyvi at sitera, hana. "Skønt de foran anførte overslagsberegninger for anlæg af en flyveplads på Færøerne er baseret på et meget spinkelt opmålingsmateriale, må det være klart, at forslagene B. Glyvursnes, C. Kirkjubønes med anlægsudgifter af størrelsesorden 50-60 mió.kr. ikke kan anbefales så meget mere, at ingen af pladserne har nogen god orientering i forhold til hoved vindretningen. Disse forhold kan ikke opvejes af den centrale beliggenhed, for det tredie forslag Thorshavn/Hoyvík gælder de samme betragtninger, idet der dog ikke er berregnet nogen anlægsudgift for en 1600 meter lang bane da terrænget ikke tillader så lang en bane. En 1000 meter lang bane kan anlægges for 10 mio.kr., men en sådan bane vil ikke løse trafikproblemet på Færøerne. Forslaget om et flyveplads på Sandø er beflyvningsmæssigt idelt og anlægsudgifterne bliver ca. 16 mio.kr., men da de er forbundet med store vanskeligheder at komme til og fra Sandø, vil dette forslag næppe kunne anvendes. Tilbage bliver således kun forslagene D. Nes og F. Vágar og her vil Nes få en 1600 meter lang bane, på alle områder have fortrin for Vágar, hvorfor Nes må anbefaldes, som den bedst egnede plads. Anlægsudgifterne bliver her ca. 25 mio.kr. mod Vágar ca. 30 mio.kr. Såfremt man vil gå ind for kortere baner end 1600 meter, vil udbygningen af Vága flyveplads blive billigst, men man skal dog ned på enbanelængde på 1400 meter, inden forskellen i anlægsudgifterne bliver væsentlige, bliver ca. 13 mió.kr. for Vágar og 23 mio.kr. for Nes. Man op-

når for dette beløb ikke de fordele på Vágar som man kan få på Nes nemlig 1. Forhold der tillader instrumentindflyvning, 2. Relativt Central beliggenhed og 3. Udvidelsesmuligheder.

So er ein onnur konklutión í hesum málinum sum er frá 1970 og hon er tikin burtur úr hesi bókini, tað er ein kanning millum Glyvursnes og Nes. "Undersøgelsen af sigtbarhedsforholdene viser, at der ikke er grundlag for at andrage, at vejrforholdene ved Nes er dårligere end ved Glyvursnes, tværtimod kan man regne med, at forholdene ved Nes vil være en smule bedre end ved Glyvursnes. Undersøgelsen af vindforholdene viser, at en bane ved Nes vil have en regularitet der er 5% bedre end en bane ved Glyvursnes. Konklutionen må da på det foreliggende grundlag blive, at Nes er den mest velegnede lokalitet". Haldast má, at hesar kanningar ikki eru ávirkaðar av lokaláhugamálum, tá tær eru gjørdar av útlendingum.

Uppskotið til samtyktar er soljóðandi, við formansins loyvi: Álagt verður landsstýrinum at hava kanningarnar frá loftferðslumálaráðnum frá 1963 "flyveplads på Færøerne"og frá 1970 "permanent lufthavn på Færøerne" við í motingunum, tá talan er um bygging av nýggjum flogvølli í Føroyum. Sostatt er hetta mál framlagt.

Formaðurin

So fær Jóhannes Martin Olsen orðið til framløgu av tingmáli nr. 24, tað er løgtingslóg um útbygging av telefonskipanini í Eysturoynni og áseting av tænastustøði hjá TFL mótvegis virnufyritøkum.

Jóanes Martin Olsen (sb.)

Harra formaður.

Tað er eingin loyna, at telefonviðurskiftini í Eysturoynni í mong ár hava verið og framvegis eru út av lagi vánalig. Júst hetta øki er tað í Føroyum har mest vinnufyritøkur eru, og er hesin trupulleikin við vánaligu telefonskipanirí orsøk til, at hópur av tíð og verður mist í sambard við vánaliga ella als ikki virk-

andi telefonskipan.

Seinastu tíðina hevur ein bólkur av monnum frá vinnufyritøkum, stovnum og kommunum í Eysturoynni gjørt vart við vandamálið í verandi og ætlandi útbyggin við endurnýtslu av gomlu tøknini, sum væl kann verða orsøk til, at hetta økið um stutta tíð aftur gerst eftirbátur í mun til restina av landinum eitt nú høvuðsstaðarøkið.

Hesin telefonbólkur hevur frá eini av fremstu teleráðgevarafyritøkum í Danmark fingið eina frágreiðing um hesi viðurskiftir. Í hesi frágreiðing finst fylgjandi almenn meting um viðurskiftini. Orsøkin til teir almennu trupulleikarnar við ikki at sleppa í gjøgnum, er týðuliga ein kapacitetsspurningur, tað hevur ikki verið gjørligt at avgera, um tann svíkjandi kapaciteturin kemst av ov lítlum grundleggjandi kapaciteti ella, hann kemur av, at partur av skipanini dettur burtur í millum vegna brek. Hvat viðvíkur øðrum brekum í skipanini sum felagarnir eru út fyri, so eru týðulig tekin um grundleggjandi brek í skipanini.

Tað er ørkymlandi, at tílíkt brek hava vart so leingi uttan, at tað hevur eydnast TFL at rætta hetta. Orsøkin til hetta kann verða ein av hesum, TFL er møguliga ikki klárt yvir ólagið, tí eingin systematisk kvalitetseftirkanning fer fram. Fyrisitingin á TFL er møguliga ikki før fyri, at gera nakað við ólagið, kervið hjá TFL er møguliga ov niðurslitið, ov gamalt og vánaligt.

Íløguætlanirnar hjá TFL áttu í teori at gjørt skipanina betur í Eysturoynni, men nógvar umstøður fáa teg at stúra fyri, hvussu henda ætlan fer at virka Ætlanirnar eru grundaðar á mátingar frá 1986, tá ið kapacitettrupulleikar eisini vóru, og tað er tí at óttast fyri, at veruligi tørvurin er undirmettur.

Tað tykja at verða serlig viðurskifti í Føroyum, sum merkja, at dagligu broytingarnar í nýtsluni av telefonskipanini eru størri enn aðrar staðir, og tað er eftir tí, sum upplýst er, ikki tikið hædd fyri hesum í ætlanini. Her verður eisini hugsað um, at allar royndir týða uppá, at sambandið er vánaligari, tá ið tað regnar, og TFL sigur, at fólk tosa meir í telefon, tá ið tað

regnar. Um so er, má tað verða náttúrligt at krevja, at skipanin klárar tørvin eisini, tá ið tað regnar.

Tann sera stóra endurnýtlan av verandi gamla kervi kemur óivað av, at vegna tekniska elli á støðini, er tað trupult og dýrt, at útvega nýtt kervi til víðkanina. Tað fær teg, at stúra fyri fylgjunum, tá ið ein drívandi partur í íløguætlanini er framhaldandi at byggja á avlopstól serliga AEK heldur ein at skifta um til nýggjan teknik, sum vildi verið meir álítandi í rakstri og kravt minni umsiting. Tann ætlaða sundurbýtingin av gomlu støðini í Havn í tvey og útbygging av eini triðju ber í sær vanda fyri nýggjum brekum og ólagum í skipanina serliga á teimum nýggju støðunum. Sambært TFL hava teir góðar royndir í tílíkum uppgávum.

Støðan í Eysturoynni sigst vera komin av, at viðtøka av víðkanini av eini íløguætlan fyri TFL var seinkað í 2 ár. Henda ætlan fevnir um eina røð av nýggjum tiltøkum, t.d. mobiltelefonskipanini. Tað kann kortini ikki góðtakast, at ein stovnur ikki sum minstamál ger íløgur á ein tílíkan hátt, at ein vanlig útbygging kann fara fram eftir tøvinum á verandi grundleggjandi tænastu.

Tekniski ráðgevin mælir bólkinum til fyri tað fyrsta, neyvt at fylgja við umlegging av telefonskipanini í Eysturoynni og upplýsa TFL um vandamál skjótt og neyvt, fyri tað næsta, felagarnir eiga á skipaðan hátta at rapportera til TFL um øll brek í skipanini og halda fram, til brekini verða rættað, fyri tað triðja, felagarnir eiga skrivliga at klaga til TFL, tá góðska og tænastur eru niðanfyri eina rímiliga hædd og fyri tað fjórða, felagarnir eiga at biðja TFL um at styrkja sambandið við felagar í Eysturoynni, t.d. við at útnevna ein serligan kontaktpersón hjá TFL viðvíkjandi Eysturoynni. Kunnu felagarnir í Eysturoynni týðum um ætlanina hjá TFL halda kontaktfundir við felagarnar, har báðir partar fáa høvi at leggja fram vandamál o.s.fr. fyri tað fimta, felagarnir eiga at biðja TFL fara í gongd við skipaðar mátingar av góðskuni á telefonskipanini, og fyri tað sætta, vinnulívið og almenna umsitingin í Føroyum eigur at umhugsa at seta krøv til TFL at styrkja tænastuveitingina yvir fyri vinnulívinum her undir ráðgeving um, og hjálp at nýta nýggja tøkni í telefonviðurskiftunum.

Við formansins loyvi. Uppskot til løgtingslóg um útbygging av telefonskipanini í Eysturoynni og ásetan av tænastustøði hjá Telefonverki Føroya løgtings mótvegis vinnufyritøkum.

Grein 1. Telefonverk Føroya løgtings verður heimilað saman við umboðum fyri vinnufyritøkum, so skal eg gera eina broyting í her, hon kemur at ljóða soleiðis, fyri vinnutøkum og kommunum í Eysturoynni at gera eina

útbúgvingarætlan, sum grundað á framkomið tøkni, kann tryggja eina høskandi teleskipan fyri økið fram til aldarmótið.

Grein 2. Útbyggingarætlanini sum, í høvuðsheitum skal verða liðug 1. januar 1989, verður sum skjótast eftir tað at leggja fyri tingið til góðkenningar.

Grein 3. Telefonverk Føroya løgtings verður heimilað samar við almennum og privatum stovnum og virkjum at gera eina endamálsorðing av tænastuskyldum telefonverksins mótvegis viðskiftafeløgum grundað á nýggjastu tøkni, sum kann tryggja stovnum og vinnufyritøkum kring alt landi lut í verandi og komandi telesamskiftismøguleikum.

Grein 4. Henda endamálsorðing verður saman við ti í grein 2 nevndu útbyggingarætlan at leggja fyri tingið til góðkenningar.

Grein 5. Til at gera útbyggingarætlanina sambært grein 1 velur telefonverkið tríggjar limir frá vinnufyritøkum, og so gera við eina rætting í her, sum eitur, og kommunum í Eysturoynni, soleiðis velir telefonverkið 3 limir, tingið 3 limir til at gera endamálsorðingina sambært grein 3. Allir limir skulu verða valdir áðrenn 1. oktober 1988.

Grein 6, henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Hetta uppskotið er lagt fram av Jógvan I. Olsen, Olaf Olsen og mær sjálvum.

Formaðurin

So far Óli Breckmann orðið til framløgu av tingmálunum nr. 42, demokratisering av útvarpsmonopolinum, 31, skattalætta fyri inntøkum av útleiging, 46, avlanislívs-og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll, 34, stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum uttanlands, 39, stuðul til oyggjaleikirnar í Føroyum, 38, sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti, 40, skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna trúboðarum, 41, vernd móti uppsøgn orsakað av felags limaskapi, 29, hækking í prisinum á iðnaðarfiski, 43, broyting í útvarpslógini, 47, demokratisering av sjón-

varpsmonopolinum, 26. ókeypis rætting av tonnum hjá børnum.

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Tøknifrøðin til útvarping av tíðindum, upplýsing og undirhaldi er so nógv broytt tey farnu 30 árini síðan Útvarp Føroya varð sett á stovn, at eitt útvarpsmonopol sum hin føroyska er ein fornleivd. Øll lond í heiminum uttan tey mest einlokkastýrdu eystan jarntjaldið og summi triðjaheimslond hava langt síðan loyst upp fyri teimum skapandi kreftum, sum lætt atkomilig og bílig sendiútgerð í dag gevur møguleika at virka frítt.

Vanahugsan og samspæl millum føroyska útvarpsmonopolið og tað til ein hvørja tíð sitandi landsstýri er atvoldin til, at Føroyar og harvið føroyska upplýsingarstøðið eru eftirbátar á hesum týðandi mentunnarøki. Eingi er hildi meira náttúrligt neyðugt enn ein margfald og fjølbáttað dagspressa, sum í ársins víðastu merking rækir eina demokratiska upplýsingarskyldu, sum vit als ikki kenna til á útvarpsøkinum. Útvarpsmonopolið við lógarfestum einkarrætti at senda tíðindi, upplýsing og undirhald á hendan hátt er ein kleppur um beinið á allari menning á hesum øki. Uppskotið miðar ikki í móti at leggja Útvarp Føroya niður. Í flest øllum londum virkar ein óheftur tíðindastovnur sum hesin undir almennum eftirlitið, men hesi seinastu árini hevur hann ikki havt einkarrætt og hevurdikki við hesum framíhjárætti, kunna forða øðrum lokal- og nærradioum at virka. Uppskotið er harafturímóti ætlað at veita øðrum felagsskapum, persónum og øðrum javnbjóðis Útvarpi Føroya rætt til at gera líknandi sendingar. Í tráð við vanliga fatan av pressufrælsinum fellur tað tí ivaleyst løgtinginum náttúrligt at taka undir við uppskotinum.

Harra formaður. Um eg kundi lisið hetta uppskotið. Løgtingið velur 9 mannaðnevnd av sakkønum at kanna og skriva álit um verkætlan til at demokratisera sjónvarp og útvarpsmonopolið. Álit nevndarinnar verður tøkt so skjótt, at landsstýrið kann leggja lógaruppskot fyri

tingið í tráð við hesa lóg og eftir tilráðing nevndarinnar í komandi tingsetu.

Grein 3. Nevndin verður mannað, so hon umboðar sakkunnleika um fjølmiðlar, mentan, trúarliv, búskap og løgfrøði og verða vald eftir vanligum løgtingslutfalsvali.

Arbeiðssetningur nevndarinnar er at finna fram til bestu og hóskandi sjónvarps- og útvarpsskipan eftir enterprisemodellinum við einum sendineti sum nú og við einum øðrum óheftum sendineti um frægastu fíggjarloysn í báðum førum, eisini møguliga við lýsingarinntøku.

Grein 5. Játtaðar verða upp til 250.000 kr. til útreiðslur, ið standast av nevndararbeiðnum.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Harra formaður. Hetta er sum so sama orðaljóð, og tað verður sama nevnd, sum eg skjóti upp skal gera broytingar í sjónvarpslógini.

So er tað løgtingsmál nr. 31. Har siga viðmerkingarnar, fyri inntøkur av útleiging. Tað er eitt mál sum eitur, skattalætti. Neyvan nakað land í heiminum hevur so stóra húsarúmd pr. íbúgva sum Føroyar. Siður er, at byggja 120 kvaðratmetrar einfamiljuhús í tveimum hæddum. Hesin byggihátturr gevur góða húsarúmd til avlop, sum liggur ónýtt ofta, tí leiguinntøka verður skattað oman á vanliga inntøku. Á størri plássum í landinum serliga í høvuðsstaðarumráðnum er húsaneyð, tí eftirspurningurin eftir íbúðum til ung hjún og eftir kømurum til ung fólk í útbúgving er størri enn útboðið av bústaðarrúmd.

Við at samtykkja hetta uppskot um skattafrítøku fyri leiguinntøkur upp til 40.000 kr. árliga, hevði løgtingið ivaleyst eggja húsaeigarum við góðum og væl nýtiligum avlopsplássi til at leiga part av annars undir útnyttaðum sethúsum út. Trýstið á leigumarknaðinum hevði lætnað, íbúðarstøðið hevði hækkað í størri útboð av búplássi til leigu og húsaleigan hevði fallið. Hetta uppskot hevði tí gagnað bæði sethúsaeigarum, sum ynskja sær ískoytisinntøku frá útleigan til at stuðla atturgjalding av nýggjum húsum, og hevði stuðlað leigarum ,sum høvdu fingið betri leiguumstøður, lægri leigugjald at dragast við, meðan tey royna at spara upp til egin sethús.

Harra formaður. Í løgtingslóg nr. 86, frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinnu broytingum verður gjørd henda broyting. Sum nýggj grein 60, 3 stk. verður sett, undantikið frá skattskyldugari inntøku er inntøka, ið stavar frá at leiga út íbúðir og kømur upp til 40.000 kr. árliga.

Henda lóg fær gildi beinavegin.

So er tað eitt uppskot, sum eitur avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll. Hetta er eitt uppskot um eina arbeiðsmarknaðartrygging við valfrælsi og við ábyrgd.

Viðmerkingarnar eru soljóðandi. Tann lívs-, avlamis- og eftirlønarskipan, sum skotin verður upp her, hevur fleiri fyrimunir fram um verandi skipanir og lógir. Fólkapensiónin er ov lág longu nú og við verandi vøkstri í talinum á eldri fólki í mun til lutfalsliga minkandi talið á vinnuførum fólki, linkar orkan hjá samfelagnum at bera fíggjarligu byrðarnar av fólkapensiónini í framtíðini. Tí má aldurdómurin hjá fólki tryggjast í størri mun enn higartil. Avlamispensiónin er hvørki til at liva ella doyggja av og samfelagsins orka at bera hægri avlamispensión má tí styrkjast, tað ger hetta uppskot í stóran mun. Vanlukkutryggingin røkkur hvørki til lítið ella stórt, og tí er rætt, at lógartryggja rættin hjá fólki, ið doyggja av vanlukku ella koma sær til skaða og avvarðandi teirra, at eiga eina trygd, sum henda lógin veitir. Henda uppskotna samtrygging hevur fleiri fyrimunir við sær. Í fyrsta lagi ávirkar hon ikki og er óávirkað av verandi pensiónsskipanum, undantikið samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, sum fellur burtur um hetta uppskot verður samtykt. Henda samtrygging hevur hesar fyrimunir fram um tað samhaldsføstu. Harra formaður. Orsakað av andingartrupulleikum verður tað ómøguligt at siga hatta navnið samhaldsfastur-arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur.

Í fyrsta lagi. Henda skipan er ein lívstrygging við stórari útgjalding við deyð í ótíð. Í øðrum lagi. er ein avlamistrygging við stórari útgjalding við avlamni. Í triðja lagi, hon verður lagað eftir tørvi hins einstaka ella yrkisfelags og munar tí betur. Í fjórða

lagi, hon sleppur tryggingartakaranum lættari í skatti, meðan hin samhaldsfasta herður skattatrýstið 4% upp um skattahámarkið. Í fimta lagi, hon virkar skjótari og munar betur enn hin samhaldsfasta, sum eingin nytta er í fyrr enn mitt í 90unum, og er tá bert ein viðfáningur. Í sætta lagi, hon tálmar almenna nýtslu, meðan hin økir um hesa nýtslu. Í sjeynda lagi, hon økir um uppsparingina í samfelagnum og gagnar harvið tí einastaka og vinnulívinum. Í áttanda lagi, hon ber í sær valfrælsi fyri tryggingartakaran eftir ynski og tørvi eisíni, sum umstøðurnar broytast, meðan hin samhaldsfasta er tung og virkar tyngjandi eins fyri øll.

Henda uppskotna samtryggingin virkar eisini fyri avvarðandi hjá tryggingartakarunum, heimaarbeiðandi húsmóðrini, einkjuni og einkjumanninum, serliga tá óvæntað deyðsfall rakar familjufólk millum 20 og 67 ára aldur, og tað eru hóast alt eini 80-90 føroyingar hvørt einasta ár.

Eini 7.000 einstaklingar í Føroyum, av 17.000 í løntari vinnu hava longu tekna trygging einsæris ella samleikstrygging gjøgnum yrkisfeløg, fleiri modell eru tøk og landsstýrið er væl kunnað við ymsar møguleikar frá tíðum samráðingar í verið hava um eftirlønar-, lívs- og avlamistryggingar við yrkisfeløg, ið hava lønar- og starvssáttmálar við tað almenna, t.d. starvsmanna-, post-, teknikar-, maskinmeistara-, løgfrøðinga-, magistara-, lærara-, sjúkrasytra- og mong onnur yrkisfeløg, sum øll eru ovurfegin um sínar skipanir. Havnar arbeiðsmannafelag hevur fingið frálíka samleikstrygging og handverkarafelagið ætlar tað sama. Føroya lívstrygging kann umsita eina slíka samtrygging fyri øll í landínum og tryggingarstovan við Kjartan Dalsgarð er altíð til reiðar at vegleiða løgtingsnevndina, ið fær málið til viðgerðar, við fakligum upplýsingum.

Ætlandi kostar ein altfevnandi samtrygging sum henda uppskotna millum 5 og 9% av árslønini hjá tryggingartakarunum, men henda peningarhædd upp til 10.000 kr. eigur at kunna dragast frá í skattinum, sum kostar landskassanum nakrar fáa 10 mió.kr. í inntøku árliga í fyrstuni. Uppsparingin í samfelagnum hevði økst 100

mió.kr. árliga við teimum 10.000 nýteknaðu tryggingartakarunum. Fyrimunir við slíkari samtrygging fram um ein naknan og eintáttaðan eftirlønargrunn sum hin samhaldfasta og fram um vanliga kapitalpensión er, at útgoldna tryggingarhæddin altíð verður dagførd við lønarlagið samstundis sum hon fremur tryggan, og støðugan, prís og lønargongd í samfelagnum yvir longri áramál.

Uppskotið er soljóðandi harra formaður. Allir føroyingar í vinnu hava skyldu at verða undir avlamis-, lívs-og eftirlønartrygging.

§ 2. Avvarðandi hjá tryggjaða koma somuleiðis undir trygging.

§ 3. Limir í yrkisfeløgum kunnu tekna samleikstrygging, einstaklingar sína egnu trygging og í báðum førum ta trygging, ið tryggingartakarar í felag ella einsæris halda hóska best til tørvin.

§ 4 Yrkisfeløg hava skyldu mótvegis limunum, at tey eru tryggjað. Allar tryggingar skulu umfata a. útgjalding við deyð áðrenn fylta 67 ár ella 60 ár, antin undir einum ella leypandi útgjaldi árliga, mánaðarliga ella samanseting av báðum. b. útgjalding við avlamni tveir triðingar av lønini ella meir áðrenn fylta 67 ár ella 60 ár antin undir einum ella leypandi, sum tørvurin er, c. útgjalding millum fylta 60 og 67 ár undir einum leypandi ella bæði.

§ 6. Aðrar tryggingar, sum fólk í felag ella einsæris hava teknað, verða ikki ávirkaðar av hesi lóg og hava framvegis gildi.

§ 7. Fólka- og avlamispensiónsskipanin verður ikki ávirka av hesi lóg, heldur ikki útgoldnu upphæddini.

§ 8. Tá henda lóg er samtykt, fer løgingslóg um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn úr gildi.

§ 9. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 10. Inngoldna tryggingargjaldið hevur frádráttarrætt frá skattskyldugu inntøkuni hjá tryggingartakaranum við upp til 10.000 kr. árliga.

So eitt uppskot um stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum uttanlands.

Viðmerkingar. Tað er einki dulsmál, at heimalcið-

irnar eru ikki nóg fongrikar til at breyðføða alt Føroya fólk á verandi livistøði. Tí er neyðugt, at líta kring alla havsbrúnna eftir nýggjum fiskivinnumøguleikum, sum kunnu kasta íløgur av sær til føroyska samfelagið. Landsstýrið ger stórt arbeiði árið runt við at tryggja okkum kvotur og avtalur í útlondum, men peningatrot darvar skipaeigarum og yrkisfelagsskapum at ferðast uttanlands í teimum londum, sum vit náttúrliga kundu havt fiskivinnusamstarv við, og ein grunnur sum hesin í uppskotinum hevði givið monnum, ið hava gott skil á samstarvsmøguleikum, eitt høvi til at sláa nýggjar leiðir. Í reglugerð fyri grunnin eigur grundleggjandi krav at verða, at ferðafrágreiðing fyriliggur altíð, tá ið hann verður nýttur at stuðla kanningarferðum.

Við formansins loyvi, § 1, Landsstýrinum verður heimilað at veita stuðul upp til 2 mió.kr. til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum og ferðir í hesum viðfangið. Stuðulin verður at umsita av trýmannanevnd vald við einum umboði fyri hvørjum av hesum feløgum, Fiskimannafelagnum, Skipara-og Navigatørfelagnum og Reiðarafelagnum, 3. stk. Stuðulin verður at seta í grunn, og landsstýrið ger reglugerð fyri grunnin.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Uppskot um stuðul til oyggjaleikirnar í Føroyum.

Viðmerkingarnar. Tað kostar ítróttarfeløgunum stóran pening at verða vertur til altjóða oyggjaleikirnar komandi ár. Ítróttarfeløgini hava mist ein hentan inntøkumøguleika, tí at hetta landsstýrið hevur sýtt fyri, at strika lógina um ítróttarvedding soleiðis, at føroysk feløg aftur fingu loyvi at søkja donsku tipstænastuna at taka í móti stuðli í sama mun, sum føroyingar tippa í Danmark. Tí sjálvt um løgtingslóg forðar føroyingum at fáa styrk frá tipsfonden, so tippa føroyingar í "vilden sky" sum áður, hjá donsku tipstænastuni. Hesa tvístøðu konu vit, í tá ið løgtingið í góðari ætlan samtykti lóg um føroyska ítróttarvedding, sum skuldi koma í staðin og yvirganga í vinningum ta donsku stuðulsskipanina, sum tipstænastan tillutaði føroyskum ítrótti og øðrum felagsskapum. Tíverri datt ítróttarvedding niður fyri, og vit fingu einki í staðin, harafturímóti mistu

vit í báðum endum. Til at samsýna føroyskum ítróttafelagi og missin frá ítróttavedding verður skotið upp, at løgtingið ásetur eina upphædd t.d. 2 mió.kr. til at stuðla føroyskum ítróttafeløgum við íløgum, sum eru neyðugar ella koma væl við til oyggjaleikirnar 1989 og lógartekstarin, harra formaður:

Landsstýrið verður heimilað at veita stuðul upp á 2 mió.kr. til oyggjaleikirnar í Føroyum í 1989.
2. stk. Stuðulin verður í fyrsta lagi at nýta til neyðugar halla- og vallaíløgur og annars til rakstrarstuðul.
§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

So er eitt uppskot, sum eitur sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti og viðmerkingarnar eru soljóðandi:

Uppskotið hevur tvinni endamál. Í fyrra lagi at styrkja uppsparingina í føroyska samfelagnum og harvið at økja evni Føroya at eginfiggja vinnulívið. Í øðrum lagi at styrkja vinnuliga og einstaklinga táttin í búskapinum mótvegis tí almenna.

Tann lagaligi rentuskatturin bert ½% av 10% er ryggurin í veldugu føroysku uppsparingini á bók í føroyskum peningastovnum. Miðal føroyingurin eigur um 120.000 kr. á sparibók, meðan danin bert eigur 65.000 kr. sambært Danmarks Statestik.

Ein lóg, bygd á hetta uppskot, hevði eisini økt evni føroyinga til at átaka sær størri part av vinnuligu íløguni í føroyska búskapinum. Hesar íløgur vóru undanfarnu 4 ár útvið 6 mia.kr. harav 2 mia.kr. vórðu lántar uttanlands, meðan 4 fingust til vega innansyndis.

Ovurhonds stóru vinnuligu íløgurnar - 130.000 kr. pr. íbúgva í miðal móti bert 65.000 kr. í Danmark - hava økt uttanlandsskuld Føroya í so mikið. Ein økt uppsparing á bók í føroyskum peningastovnum hevði styrkt figgjarorku føroyska samfelagsins við eini tveimum hundrað mió.kr. eyka um árið.

Búskapurin er spentur í løtuni og verður tað helst eina tíð fram. Til tess at stovnfesta búskapin hevði ein uppsparing sum henda munað betri enn tilsvarandi inntøka av peningi í landskassan ella í almennar grunnar.

Um leysliga helmingurin av skattgjaldarum landsins kunnu hugsast at nýta henda møguleika at spara upp við skattafrádrátti, hevði lógin givið peningastovnunum eina eyka innskotsupphædd upp á minst 150 mió.kr. árliga.

Við 30% í miðal landsskattlegging av seinastu 10.000 kr. missir løgtingið bert um 150 mió.kr. í skattainntøku árliga.

Ein mestaupphædd javnbjóðis fyri øll upp á 10.000 kr. hevði tann fyrimun, at hon kemur øllum inntøkubólkum javnt til góða sum uppsparing í skattafrádrátti. Tað, ein hevur ráð til at lata í skatti, hevur ein eisini ráð til at seta inn á bók, meðan ein upphædd sum sentuellur partur av ársinntøkuni við skattafrádrátti hevur komið teimum størru inntøkunum meira til góða enn teimum smáu.

Fyri innskjótarar hevði ein 10.000 kr. upphædd árliga og uppsparing við rentutilskriving eftir trimum árum givið útvið 40.000 kr. innistandandi hjá hvørjum.

Lógartekstirin er soljóðandi harra formaður:

§ 1. Persónar undir fullari skattskyldu í Føroyum kunnu hvørt inntøkuár seta inn á serliga bundna konto í føroyskum peningastovni upp til kr. 10.000 og draga upphæddina frá skattskyldugu inntøkuni sama ár, hon er inngoldin.

§ 2. Verða tær einstøku inngoldnu upphæddirnar tiknar út, áðrenn 4 ár eru liðin eftir inngjalding, verður frádrigna upphæddin tald upp í skattskyldugu inntøkuna tað árið, peningurin verður úttikin.

§ 3. Frá fimta ári eftir, at skattgjaldari er byrjaður at spara upp eftir hesi skipan, verður loyvt at taka út av bundnu kontoini bert upphædd, svarandi til upphæddina fyrsta innsetingarárið uttan so, at úttikna upphæddin verður nýtt til:

1. Íløgu í nýstovnað virki skattgjaldarans.
2. Íløgu í nýkeypt sethús, til egna nýtslu og bert einaferð.
3. Nýtast til at gjalda útreiðslur í samband við útbúgving, sum tekur minst 2 ár at fullføra.
4. Úttøku 5 ár eftir innsetingardagin.

§ 4. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Harra formaður. Næsta uppskotið er um skattafrí-

tøku av kirkjum og samkomum til at samsýna trúboðarum.

Viðmerkingar.

Fólkakirkjan, missiónin og túarsamkomur okkara røkja umfrant eitt kristniboðaraarbeiði eina umfatandi samfelagsliga tænastu, sum aldri kann gerast upp í krónum og oyrum.

Eitt fjølment lið av føroyingum, sum eftir at hava givið keisaranum (t.e tí almenna) tað, ið tí tilkemur, letur dyggan fíggjarligan stuðul til kirkjur og samkomur sínar.

Ein týðandi partur av trúararbeiðinum er kristniboðanin, sum verður røkt av okkara egnu og stundum vitjandi útlendskum trúboðarum, sum hava eina inntøku fyri neyðini til at liva av.

Galdandi skattalóg áleggur trúboðarum skattskyldu, hóast teirra ofta lítla inntøka er samsýning í form av eini gávu, sum kirkju- ella samkomuliðið savnar inn sínámillum.

Allir tingmenn skilja, hvussu náttúrligt tað skuldi verið at sloppið samkomunum undan av skattligum ávum at savna dupult so nógv inn at samsýna trúboðarum sínum og vitjandi, sum neyðugt er, fyri at samsýningin skal muna til lívsins uppihald og ferðing til og frá Føroyum.

Okkara kirkju- og samkomulív verður andliga ríkari og røkkur harvið longri í kristniboðanini og sosiala virkseminum, um kirkjulið, missión og fríu samkomurnar høvdu sloppið undan skattskyldu av trúboðarasamsýning soleiðis, at tær gávur, sum innsavnaðar verða, høvdu rokkið dupult so langt, sum tær gera eftir galdandi skattalóg.

Við formansins loyvi, lógarteksturin:

§ 1. Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Sum nýggj § 33, nr. 13 verður sett:

"Gávur, ið givnar verða til frama fyri føroyskt ella útlendskt trúboðaravirksemi, ið útint verður í Føroyum ella uttanlands."

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

So harra formaður, uppskot, sum eitur vernd móti uppsøgn orsakað av fakfelagslimaskapi.
Viðmerkingar:

Hetta lógaruppskot um vernd móti uppsøgn av fólki orsakað av fekfelagslimaskapi er í tráð við ST-mannarættindarreglur og við § 11 í Europeísku konventiónini um mannarættindi, sum ikki bert tryggja øllum borgarum í samfelagnum rættin at skipa seg í fakfeløg, men eisini rættin til at standa óheft av yrkisfelag.

Frælsið at standa óheftur er staðfest í fleiri nógv umtalaðum dómum við mannarættindardómstólin í Strassbourg, hagar fólk leitaðu sær skjól undan fakfelagstvingsli og uppsøgn úr arbeiði, tí viðkomandi persónar av samvitskugrundum ikki vildu líða undir yvirgangi av diktatoriskum eksklusiv-sáttmálum.

Á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru dømi um eksklusivavtalur, sum skerja menningina á viðkomandi virkisøki, darvandi samfelag og løntakarum pening av verkfallsstampum.

Í flestu framkomnu londum verja lógir sum henda lønarmóttakarar móti tvingsli, tryggja lønmóttakarar í móti uppsøgn orsakað av limaskapi ella ikki-limaskapi í fakfelag. Í Danmark kom lógin í gildi í juni 1982, og legði Svend Auken vegna donsku javnaðarstjórnina tá uppskotið fyri fólkatingið, sum samtykti tað, so tað gjørdist og er nú lóg.

Harra formaður, við loyvi hiðani er lógarteksturin soljóðandi:

§ 1. Arbeiðsgevari kann ikki síga úr starvi ein lønmóttakara, tí at hesin er limur av einum felag ella av einum ávísum yrkisfelag.

§ 2. Arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønmóttakara, tí at hesin ikki er limur av einum felagsskapi ella av einum ávísum yrkisfelagsskapi.

2. stk. Visti lønmóttakarin við setanina, at arbeiðsgevarin setti krøv um limaskap av einum felag ella ávisum yrkisfelagsskapi sum treyt fyri arbeiði á virkinum, kann 1. stk. ikki nýtast.

3. stk. Tá lønmóttakari verður gjørdur kunnugur við, at limaskapurin er ein treyt fyri framhaldi av setanini í

virkinum, kann 1. stk. ikki nýtast.
§ 3. §§ 1 og 2 í lógini eru ikki galdandi fyri lønmóttakarar, sum eru í starvi hjá einum arbeiðsgevara, hvørs virki sum sítt lýsta endamál hevur at fremja eina ávísa politiska, hugsjónarliga, átrúnaðarliga ella mentannarliga støðu, og viðurskiftini hjá avvarðandi mugu haldast at vera av týdningi fyri virkið.
§ 4. Verður ein lønmóttakari í móti §§ 1 og 2 sagdur úr starvi, skal arbeiðsgevarin rinda endurgjald.
2. stk. Endurgjaldið eftir 1. stk., sum ikki kann fara upp um lønina fyri 78 vikur, verður ásett uttan mun til lønmóttakarans sotannartíð og málsviðurskiftini annars.
§ 5. Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

So er tað ein lítil lóg her um hækking av prísum á íðnaðarfiski.
Viðmerkingar.

Hvørja ferð Havsbrún kunngerð prísáseting á íðnaðarfiski, ger virkið vart við, at prísirnir høvdu verið 4 - 5 oyru hægri pr. kg, um virkið slapp undan at lata serliga oljuavgjaldið til landskassan.

Føroyski nótaflotin hevur nú triðja árið á rað ikki nóg stóra inntøku til rentur og avdráttir. Manningarinntøkurnar fullu úr 204.000 kr. í 1986 niður í 141.000 kr. í fjør í miðal. Nótaskipini høvdu klárað seg betur fíggjarliga og manningarnar fingu meira, um oljuavgjaldið, Havsbrún letur landskassanum, fleiri mió.kr. árliga, kundi komið fiskaprísunum til góða.

Við formansins loyvi:
§ 1. Íðnaðarvirkið Havsbrún í Fuglafirði sleppur undan at gjalda eykaavgjaldið upp á oljuavgjaldið upp á 50 oyru kg.
§ 2. Upphæddin av § 1 verður at nýta til at hækka tilsvarandi prísin á íðnaðarfiski.
§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.
Broyting í útvarpslógini.
Viðmerkingar.

Lógaruppskotið hevur til endamáls at beina skeivleikar í verandi lóg um útvarpsgjald, sum ikki verður fylgd.

Sum tíðindamonopol hevur Útvarp Føroya m.a. fram-

hjárætt (eins og Sjónvarp Føroya), at lógin heimilar stovninum at krevja og panta eftir lurtaragjaldi av hvørjum einasta radiotóli í landinum.

Radiohandlar hava skyldu at boða Útvarpi Føroya frá, hvørja ferð eitt móttøkutól verður selt. Í øllum landinum munnu finnast tíggjutúsundtals radiotól, sum eftir galdandi lóg øll eiga at bera hvør sítt lurtaragjald.

Sostatt gongur Útvarp Føroya ikki eftir bókstavinum í lógini, og túsundtals radiotól sleppa undan at bera lurtaragjald.

Útvarp Føroya hevur tarnu 10 árini fingið millum helming og 2/3 av samlaðu inntøkum stovnsins frá lurtaragjaldinum (t.d. 1,6 av tilsamans 3,4 mió.kr. í 1976/77 og 14,3 av tilsamans 21,8 mió.kr. í 1987). Neyvan verður býtið stórvegis broytt ella samlaða inntøka tíðindamonopolsins nógv skerd av hesum uppskoti.

Lurtaragjaldsinntøka útvarpsins í fjør lá um 14,3 mió.kr, svarandi til um 20.000 radiotól á 700 kr. í gjaldi hvørt. Í Føroyum eru eini 15.000 húsarhald og einar 1300 krambúðir, virki og skrivstovur, sum Útvarp Føroya fær inntøku frá gjøgnum lurtaragjaldið.

Nógv eru tó tey, sum fáa bæði tvey og trý uppkrøv, og antin sleppa summi sær undan at gjalda fyri tað eina, og /ella gjalda onnur fyri meira enn eitt radiotól.

Hetta lógaruppskot miðar móti at broyta verandi lóg um útvarpsgjald, so lógin samsvarar betur veruleikanum nevniliga, at hvørt húskið rindar eitt lurtaragjald í staðin fyri at verða kravt eftir einum gjaldi fyri hvørt radiotól, leyst og fast, stórt og lítið, við hús ella í bilinum.

Við hesum uppskoti høvdu vit sloppið undan tí mannamuni, at summi húsarhald sleppa undan at rinda, meðan onnur rinda upp í fleiri.

Harnæst sluppu vit undan tí skeivleika, sum liggur í, at lógir hvørki virka eftir ætlan ella verða fylgdar.

Harra formaður, við loyvi, lógartcksturin:

§ 1. Í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp verður § 3, 1. stk. orðað soljóðandi:

"Til útvarpið skal hvørt húsarhald rinda gjald fyri ein radiomóttakara. Sama er galdandi fyri virki, skip, handlar, skrivstovur o.t. Fyri móttakarar í bilum og bátum undir 5 br.reg. tons verður einki gjald at rinda".

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1989.

Harra formaður. Her er eitt lógaruppskot um demokratisering av sjónvarpsmonopolinum, og veruliga er uppskotið nokk so líkt tí um útvarp, sum varð framlagt frammanundan, sjálvt um arbeiðsvirkið er nakað øðrvísi, men fyrst skal eg biðja formannin um loyvi at lata ta framløguna at galda hesa eisini. Takk fyri.

So kemur eitt uppskot her, tað er tað seinasta. Tað er um ókeypis rætting av tonnum hjá børnum. Viðmerkingarnar eru hesar:

Vanlig tannarøkt er í dag ikki kostnaðarmiklari enn so, at fólk flest velja at halda tenninar viðlíka sum best. Talið á tannlæknum og býtið av tannlæknadømum er soleiðis, at tænastan fevnir allar borarar í landinum.

Men ein partur av tannarøktini liggur enn á láni, og tað er rætting av tonnum hjá børnum. Ymiskt er, sum føroyskar kommunur gjalda foreldrum aftur fyri hesa tannarøktartænastu. Sumstaðni bera foreldrini størsta partin av kostnaðinum, og har kostar vanlig ramma til tenn fleiri túsund krónur.

At hava beinar tenn er grundleggjandi fyri tannaheilsuna, og tað er órættur móti børnum, sum tey vaksa til, at fíggjarligar orsøkir forða teimum í at vera errin av tonnunum, tí tær eru skeivar, og tí ofta truplari at røkja.

Í okkara framkomna samfelag hevur heilsutænastan skyldu til í sama mun sum við aðrari tannarøkt at bera kostnaðin av, at tenn hjá børnum verða rættaðar í ungum árum. Samfelagnum kemur tað til gagns við lægri útreiðslum av tannarøkt seinni, um rætting av tonnum hjá børnum bíliga fyri foreldrini er grundleggjandi krav, vit seta okkum sjálvum sum vælferðarsamfelag.

Grundreglan má vera, at fíggjarligar orsøkir hjá foreldrum ikki forða børnum í, at fáa skeivar tenn rætt-

aðar.

Tað er eitt uppskot til samtyktar, við formansins loyvi:

Løgtingið áleggur landsstýrinum at bera so í bandi, at foreldur at børnum í skúlaaldri sleppa undan at rinda tær ovurstóru útreiðslur, ið standast av at fáa tenn hjá børnum rættaðar.

Takk fyri.

Formaðurin

So er ikki meira til henda fundin, og so vítt eg havi fingið at vita, so verður fundur aftur um eitt korter, t.v.s. kl. 20.30. Tá verða tvær 2. viðgerðir av tingmáli nr. 14 og tingmáli nr. 9 og tað verður atkvøðugreiðsla um fyrispurning nr. 100-2 til Lassa Klein um telefonviðurskiftini í Svínoy. Síðani verða 1. viðgerðir av nr. 45, 27, 28, 35, 32, 44, 30, 36, 33, 37, 47, 43, 41, 29, 40, 38, 39, 34, 46, 3 , 42, 24 og 26. So vítt eg dugu at siggja, so eru hetta tey tingmál, sum liggja her. Nú eri eg ikki heilt greiður yvir, um formaðurin fekk frávik frá tíðarfreistini í øllum hesum málunum. Um so er, byrja viðgerðirnar, um ikki, so skal tíðarfreistin frávíkjast.

So er fundur lokin.

Fundur settur kl. 20.30.
(Tekniskur feilur við upptøkutólinum).

Anfinn Kallsberg (ff.)

(Viðgerð av løgtingsmáli nr. 45)
har norðuri, at bergholini, sum eru í brúki har norðuri, eru gjørd seinast í 60-unum, og tað er eingin loyna, at útviklingurin hesi 20 árini hava gjørt, at bergholini eru ótíðarhóskandi í dag. Tað var rímiligt ikki møguligt í 1965, tá ið farið varð undir hesi arbeiðini, at siggja tann útvikling, bæði hvat viðvíkur ferðsluøkingini og eisini stødd av akførum, og veruleikin er í dag, at tann

tunga ferðslan, bussar, trailarar og lastbilar, ikki hava møguleikar at møtast inni í hesum her bergholinum.

Fyri at bøta um hesi viðurskiftini, er nú farið í gongd eitt arbeiði við at víðka um sjálvi vikíplássini, tey eru alt ov stutt, sum er, og tey eru eisini ov lág. Her hevur man so roynt at gjørt víðari hol við at bora og spreingja, men eg trúgvi ikki, at hesar ábøturnar eru til stóran bata, tí at akførini m.a. trailararnir eru so ógvuliga stórir.

Tað hevur eisini verið frammi í fjølmiðlunum um at víðka hesi berghol norðeftir, men eg trýugvi, at tann loysnin er ógjøgnumførlig av teirri orsøk, at ferðslan so má steðgast. Ferðslan er so mikið stór har í gjøgnum í dag, tað er so mikið nógv av vinnulívinum og arbeiðsregini eystan fyri Múla, sum er grundað á flutningin í gjøgnum bergholini, at tað ikki letur seg gera.

Vit hava tí upplivað nú í summar, at tað hevur verið stongt frá kl. 11 á kvøldi til kl. 6 á morgni, og bara tað er til ógvuliga stóran báða fyri bygdalívið har norðuri.

Eg hevði eitt uppskot her á tingi í 1986 um, hvussu man kundi gera tað soleiðis, at tann ferðsla, sum har gongur ígjøgnum, sum ikki kann halda sína vikiskyldur fær eina ljósregulering at halda seg til soleiðis, at man einsrættar ferðsluna og harvið forðar fyri, at hesi stóru akførini møtast inni í bergholinum.

Men hetta hevur ikki vunnið frama higartil, og eg havi tí sett hetta uppskotið fram av nýggjum. Eg haldi sjálvur, at tað er einasta loysn, sum kann gerast fyri at bøta um tey viðurskiftini og harvið økja um tryggleikan sjálvan.

Tað arbeiðið, sum fer fram nú í norðara bergholinum, er, at ferðslan har er heilt ótolandi. Tað er beinleiðis ein deyðsfella at koma inn í. Har eru stórir hyljar, sjálvur banin í bergholinum er niðurslitin, so at tað er vatn allastaðni, og áðrenn tú veitst av, so rennur tú í ein djúpan hyl, og harvið kanst tú skjótt missa tamarhaldið á sjálvum bilinum. Har er ofta nógv av gassi bæði frá spreinging og frá arbeiðsamboðum, sum ger at sýnið er ógvuliga vánaligt. So um hetta skal halda á

leingi enn og at mann fer undir sama arbeiði í hinum bergholinum, so meti eg sjálvur, at tað fyri tað fyrsta gongur long tíð, áðrenn vit fáa skipað viðurskifti aftur, og eg haldi, at vit kunnu sum tingmenn yvirhøvur ikki verða bekentir við hetta.

Hetta uppskotið, sum fyriliggur, gongur tí út uppá, at fara undir fyrireikingarnar av nýggjum dupultsporaðum bergholi eystur um Fjall, og meðan hesar verða gjørdar, so at seta upp eina ljósregulering inni í bergholinum soleiðis, at tann einsrættingin, sum eg havi umtalað, kann verða framd. Eg trúgvi, at tað loysir trupulleikarnar minst líka so væl sum tað arbeiðið, sum nú er í gongd.

Eg havi latið mær fortalt, at arbeiðsamboðini, sum verða brúkt í bergholinum, eru tey, sum vóru í brúki til boring til Kunoyar, og eg havi eisini latið mær fortalt, at orsøkin til, at man ger hesa royndina er, at man ikki hevði brúk fyri hesum greiðum í løtuni og hevði arbeiðsfólk tókt til bergholsarbeiði, og tí hevur man placerað tey har.

Um tað er trupulleikin at fáa placerað greiðir og placerað fólk, so haldi eg, at tað var eitt nógv betri hugskot at taka og flyta hesar greiðirnar vestur til Gásadals og fara undir tað bergholið til Gásadals beinanvegin soleiðis, sum landsstýrisraðurin ferð eftir ferð hevur sagt, at hann vil gera. Tá ið tað so er liðugt, og tá ið bergholið eystur um Fjall er projekterað, at koma norður aftur at gera dupultsporað berghol norður í Sund.

Takk fyri harra formaður.

Eg mæli til, at hetta málið fer í samferðslunevndina.

Heini O. Heinesen (tf)

Harra formaður.

Eg skal ikki skoyta nógv upp í tað, sum ført er fram. Eg kann vera púra samdur við Anfinn Kallsberg í tí, sum hann hevur sagt um viðurskiftini har norðuri, soleiðis sum tey eru í dag. Men tá ið eg lesi hetta upp-

skotið her, so má eg siga akkurát sum er, at tað kundi verið nokk so áhugavert at fingið at vita, hvønn Anfinn Kallsberg brúkar sum tekniskan serkunnleika í hesum uppskotinum. Um hetta uppskotið verður samtykt, so stendur her dupultsporað berghol í millum Ánirnar, Árnafjørð og Depli, so vita vit, at hetta kostar dupult so nógv sum at fara tvørtur í gjøgnum beint yvir av byrgingini um Hvannasund.

Tað er tað, sum eg havi at finnast at í hesum málinum, og hetta vil ikki framskunda málið, hetta uppskotið her, um tað verður samtykt, í staðin fyri vil hetta hindra málinum nógv.

Um man í staðin fyri gjørdi, sum eg nevndi í fyrispurninginum, sum eg hevði til Lassa Klein men ongantíð fekk nakað svar, projekteraðu eitt berghol eystur um Fjall beint yvir av har, sum greiðirnar og útgerðin til Kunoyartunnilin stendur, arbeiðsplássið stendur uppi har, so kundi man væl byrjað at borað har, man kundi bara selt grótið, sum kom út, tað kostaði ongar pengar. Í staðin fyri at her skal etablerast eitt nýtt arbeiðspláss, bora eina bergholslongd, sum er dupult so long, sum hon annars kundi verið.

Eg dugi als ikki við mínum besta vilja at síggja, at tað er ein fyrimunur at fáa long berghol. Vit í Kunoynni hava tað longsta bergholið, og vit hava longu trupulleikar av luftini inni í bergholinum, við tað at tað verður roykur inni, bara nakrir bilar koyra ígjøgnum, og um ættin ikki er til vildar, so er ógvuliga skjótt, at tað vísir seg at verða trupulleikar við gassi inni í bergholinum.

Nú hevur Anfinn Kallsberg ført fram, at tað er nógv ferðsla gjøgnum bergholið eystur um Fjall, so at fara at gera serliga long berghol har, tað ikki er neyðugt, haldi eg, tað er ikki nøkur klók loysn. Eg vildi hildið, um hann vildi framskunda málið, so kundi hann heldur skotið upp, at teir byrjaðu at bora í grótbrotinum hjá partamanninum Jógvani við Keldu, har er jú gott innslag at byrja, og hann kann selja grótið fyri sama prís, so kostar tað ongar pengar. Honum nýtist ikki at bora skjótari, enn hann selir, so ber hann kostnaðin

har.

Í aðrar mátar so vil eg verða við til at viðgera hetta málið í størstu vælvild. Men so er spurningurín einaferð afturat, hvussu tingmaðurin heldur, man kann skaffa so nógvan pening upp á so stutta tíð, tá hann kemur við uppskotinum nú beint upp undir valið.

Tað er eitt afturat eisini, at tá man nevnir tað, at man skal brúka greiðirnar, sum man borar gjøgnum Kunoynna við, til at bora eystur um fjall, tað hevur partamaðurin hansara har norðuri í Klaksvík nevnt, so letur tað seg als ikki gera. Tær greiðirnar eru ikki egnaðar at bora slíkar tunnlar við. Teir høvdu stórar trupulleikar við at bora Kunoyarturnilin, sjálvt um tað er rekord í tunnilsboring, eg veit ikki í Norðanlondum men í Føroyum, so máttu teir lyfta borivognin upp fyri at røkka ordiliga. Um man tá í staðin brúkti Leirvíkar-greiðirnar, so vildi man kunnað bora væl skjótari og fingið eitt snøggari og betri hol. Eg vil ikki tala um, um man boraði dupult, so fekk man alt tað grót, sum man hevði brúk fyri. Man hevur í staðin fyri brúkt 15 mió.kr. at sprongt grót leyst yviri á Strond við ongum skili.

Eg veit ikki, um eg skal siga so nógv afturat.

Eg vil eisini mæla til, at málið fer í samferðslu-nevndina, har fáa vit høvi at viðgera tað. Eg skal ið hvussu so er verða positivur.

Takk fyri.

Anfinn Kallsberg (ff)

Harra formaður.

Nú spurdi nevndarlimurin í samferðslunevndini um, hvørn eg hevði havt til tekniskan ráðgevara. Har má eg viðganga, at eg havi ikki havt nakran tekniskan ráðgeva-ra her. Hetta eru bara mínir tankar, og tað skal ikki skilja okkum, tá ið man fer at gera eitt projekt og man finnur eina aðra loysn fyri, so er alt í lagi við tí frá mínari síðu.

So spyr Heini O. Heinesen, hvar peningur skal koma frá til hetta bergholið. Nú stendur eingin sum helst

tíðarfreist fyri, nær hesi bergholini skulu fremjast, hvørki í uppskotinum ella í viðmerkingunum, og tað er gjørt við vilja. Tí sjálvandi skal eitt so stórt projekt sum hetta tillagast í eini prioritering fyri størri íløgur á samferðsluøkinum, so peningurin má upp á eitt ella annað tíðspunkt verða tøkur til hesi her bergholini, men um tey koma um 1 ár ella 2 ár ella 3 ár, tað má væl saktans fíggjarorkan verða tað, sum er avgerandi um.

So sigur Heini O. Heinesen nakað um, at greiðirnar í Kunoynni eru óegnaðar til hetta arbeiðið. Tað eri eri eg fullkomiliga samdur í, men eg rokni við, at tær greiðirnar nokk kunnu brúkast til eitt berghol til Gásadals. Eg nevndi, at hesar greiðirnar í dag verða brúktar til at víðka víkiplássini við. Eg eri greiður yvir, at tær greiðirnar kunnu ikki brúkast til eitt nýtt berghol, men hasar detaljurnar skulu vit nokk verða samdir um, tað ivist eg ikki í, og tað gleðir meg, at Heini O. Heinesen er positivur yvir fyri málinum.

Takk fyri.

Heini O. Heinesen (tf.)

Kærra formaður.

Nú veit eg ikki, um tingmenn eru áhugaðir at lurta, hvussu man loysir tunneltrupulleikan í Norðuroyggjum, tað eru ikki nógvir aðrir, sum lurta í kvøld, men tá ið Anfinn Kallsberg nevnir Árnafjørð so kann eg gott siga, at hatta havi eg langt síðan hugsa um tí um man boraði eitt hol eystur um Fjall fyrst, antin úr Ánirnum ella millum Ánirnar og Strond ella longur norður, so kundi man møguliga breiðkað annan tunnilin til Árnafjarðar meðan teir koyrdu norður eftir, meðan tann breiðkingin fór fram, um ikki Anfinn Kallsberg helt tað verða heilt ómøguligt, at ein so lítil bygd kundi koyrt ein umveg. Tað er bíligari at breiðka ein tunnil, um man kann steingja hann, og ta fær man eitt ógvuliga perfekt arbeiði, tá ið man hevur gjørt útspreingingina áðrenn. So nevndi hann okkurt, at eg hevði spurt hvar peningurin skuldi koma frá, og eg meinti við.....

(ólýðð á bandinum)

Óli Breckmann (ff.)

.....men eg kann garantera løgtinginum, at tey allar flestu av hesum tingmálunum táa uppbakking í Fólkaflokkinum av einum samdum heilum Fólkaflokki. Tað kemst av tí, at at tingmálini eru rættiliga væl í tráð við stevnuskránna hjá Fólkaflokkinum, og tey eru tí eisini í góðum hondum, hvat ið okkara flokki viðvíkur, men tað var ein tíðarneyð, sum gjørdi, at eg sjálvur standi fyri uppskotinum, men flokkurin bakkar tey ivaleyst øll somul upp.

Formaðurin

So vóru ikki fleiri sum hava biðið um orðið. Málið verður beint til viðgerðar í fíggjarnevndini.

Síðan er tað 1. viðgerð av tingmáli nr. 44, tað er viðvikjandi rúsdrekkalógini og skamtannarskiparini. Hvør biður um orðið?

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Landsrætturin hevur fingið eitt appelmál frá fútanum, also hetta er ikki eitt injurimál harra formaður, men hetta er eitt mál um dokumentfals. Sum verða man, var hetta ein mál í undirrættinum, sum fútin tapti. Eisini fútin tapir, tí hann leggur sak í móti Dagblaðnum, tað eru ikki bara øll onnur. Málið snúði seg um, antín tað er møguligt hjá einum persóni at koma inn á eitt fólkayvirlit og inn á eina almenna skrivstovu og fáa útfliggja tey neyðugu dokument, tey neyðugu loyvi, sum krevjast til at innloysa øl upp til gullstyrki, uttan at viðkomandi persónur hevur tørv á at vísa, hvør hann ella hon er, uttan at skula dokumentera, um viðkomandi hevur aldur til at innloysa henda rúsløgin ella ikki. Tað eru jú týðulig prógv fyri, at tann skamtannarskipan, sum vita hava, og sum miðar í móti at forða

fólki undir ein vissan aldur at innloysa rúsløg, at tann skipanin virkar ikki, harra formaður. Hetta uppskotið er ein roynd, ein áheitan á landsstýrið, og tað er at ein meiriluti í løgtinginum nú aftan á, at málið fekk hasa vendina í undirrættinum, sum tekur undir við, at løgting og landsstýrið hava skyldu til at tryggja, at fólk undir aldur, ung fólk heilt niður í børn ikki kunnu frítt koma inn á tær almennu skrivstovurnar, sum geva møguleika fyri, at hesi børn kunnu fáa øll innloyst, og at tað harvið økir um rússdrekkavandan sum hóttir okkara fólk. Eg vænti og vóni, at hetta uppskotið fær eina góða viðgerð. Eg fari at heita á formannin, um at tað verður beint í rættarnevndina.

Adolf Hansen (fr.) viðmerking

Harra formaður.

Tá ið hetta málið varð lagt fram, vóru tað fleiri her á tingi, sum høvdu lagt merki til hetta við skattaváttan samanborið við dato 1. september 1988, og tað eydnaðist so, áðrenn uppskotstillarin var niðuraftur farin, Svend Aage Ellefsen at fáa sagt honum tað, so at hann fekk rættað tað.

Nú kemur uppskotsstillarin her og sigur frá, at landsrætturin hevði fingið eitt mál og tað vísir seg, at hetta málið og tað, sum er farið í landsrættin er sama mál. Tað meti eg, er sera óheppið, at man kemur á ting við einum máli, ger tað til løgtingsmál, sum liggur í einum landsrætti, tí tað er jú gamal góður skikkur at geva rættinum frið at sita meðan hann situr, so eg haldi, at tað er sera óheppið. Nú veit eg ikki, hvat orð man hevur loyvi til at brúka harra formaður, men eg vil persónliga kalla tað fyri at manipulera við landsrættinum. Eg veit ikki, um eg havi loyvi til at brúka tað orðið um hetta, men soleiðis virkar tað upp á meg, tá ið tað verður sagt beinleiðis, at málið er lagt fyri landsrættin, so eg haldi, at tað er sera óheppið, og framvegis má eg gera sum í áðni, eg má takka Fólkaflokkinum fyri, at teir eru so mikið skilagóðir, at teir ikki tóku undir við hesum.

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Eg vísti bara til, at eitt mál var í landsrættinum, sum var ikomin av tí, at tað lá prógvað møguligt hjá fólki at fara inn á neyðugar skrivstovur og fáa tey skjøl, sum krevjast fyri at kunna innloysa øl, rúsløg upp til cina ávísa styrki, og tað var so bara ein illustratión.

Annars vóni eg, at Adolf Hansen síðsti æraði talari ikki segði tað seinasta í fullum álvara, men hinvegin ivist eg ikki í, at eisini síðsti æraði talari er greiður yvir tann vandan, sum liggur í tí, at fólk heilt niður í 13 ára aldur hava møguleika fyri at fara inn og keypa so nógv øl, sum teimum lystir.

Eg fari at biðja løgtingið taka hetta málið upp í tí álvara, sum tað hevur uppiborið, og sum sagt, eg ivist ikki í, at Fólkaflokkurin eins og seinast allur, sum hann er, tekur undir við hesum uppskotinum. Tað skal verða mín vón, at fleiri tingmenn, eins og eg minnist Sverri Midjord t.d. seinast, taka undir við hesum málinum. Takk fyri.

Formaðurin

So vóru tað ikki fleiri sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað og tingmál nr. 44 verður beint til viðgerðar í rættarnevndini.

Síðan kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 36, uppskot um dagføring av hagtølum. Hvør biður um orðið?

Óli Brecknann (ff.)

Harra formaður.

Nú skuldi hetta uppskotið eisini borið í sær eina áheitan á landsstýrið frá løgtinginum um, at tann árbókin, ið plagar at koma fyri árið frammanundan, verð gjørd liðug eitt síndur fyrr í árinum, tá ið hon kemur út, enn hon verður. Tí ofta er árið meira fullrunnið, tá

ið bókin endiliga er tøk á donskum og á føroyskum, ofta fyrr á donskum enn á føroyskum. Nú skuldu teldurnar verið so mikið framkomnar, at teksturin fyri tað mesta lá inni á diskunum soleiðis, at bara broytingarnar fyri tað síðsta árið vórðu innførdar og so møguligt ein viðkomandi tekstur, sum skuldi inn fyri gongdina tað seinasta árið.

Tingmenn vita, at hagtølini fyri eitt ár liggja ofta tøk longu á nýggjárinum. Vit kunnu fáa nýggjárstøl løgmans, haldi eg, tað plagar at eita, um ársskiftið, og tá ið løgmaður heldur sína ólavsøkurøðu, so uppliva vit tað sama, tað eru ofta dagførd tøl, heilt fram til 1. juli, og tí er tað, haldi eg, eitt vist ósketni ella ein undirprioritering av tí arbeiði, sum liggur í hesum her ársritinum, sum vit eru glað fyri, tí at ársritið vísir ofta eitt longur tíðarskeið enn, hvat ið tey hagtølini, sum vit fáa á nýggjárinum og á ólavsøku, vísa. Serliga galið haldi eg, at tað er í ársfrágreiðingini við tølunum, sum viðvíkja bústaðarviðurskiftum í Føroyum og eisini uppbólking millum teir ymsu tættirnar í vinnulívinum og tí almenna also soleiðis, at vit ikki síggja vinnubýtið millum tað arbeiðandi fólkið, sum er nýggjari enn 1977. Eg hugsi, at tað hongur saman við, at tann seinasta fólkateljingin var í 1977, men tá ið vit hugsa um, hvussu nógv samfelagið broytist nú á døgum, og hvussu týdningarmikið tað er, fyri at politikarar skulu kunna hava eina rættiliga góða fatan av tí veruligu støðuni í samfelagnum, so haldi eg, at tað er umráðandi, at hasi tølini verða ajourførd hvørt eitt einasta ár. Tað nyttar einki at siga, t.d. at 5 ella 10% av Føroya fólki arbeiðir í fiskiflotanum, at 11% arbeiða í fiskivinnu, tá ið tølini liggja eini 10 ár atturi í tíðini, og tann veruliga myndin er ein heilt onnur í dag, enn hon var tá.

Eg minnist væl í 60unum og 70unum, at man gekk og leitaði eftir eini orsøk til, at vit ikki vistu, hvat ið hendi aftan á kríggið, vit høvdu ikki hugmynd av, hvørjar ørsøkirnar vóru til, at samfelagið fór á húsagang í 1951 og vit vórðu bumbað 10 ár aftur í tíðina, og brekið, søgdu menn tá, lá í einum totalum mangli av hag-

tølum. Tað er harmiligt, at vit í dag á ein hátt, skulu vera í somu støðu, hvat ið hesum hagtølum viðvikjur. T.d. at vit ikki vita, hvussu bústaðarhagtølini síggja út aftan á 1977 hóast, at vit vita, at tað verða bygd 300 sethús um árið, og tað tí eru 3.500 sethús ella ein fjórðingur meir sethús til í landinum, enn tað vóru í 1977. So eg fari at heita á løgtingið um at áleggja landsstýrinum, at hesi tølini verða førd ajour, tí tey hava týdning fyri, at løgtingið skal hava eina fatan av samfelagsgongdini í líka stóran mun, sum mong hagtøl hava, sum vit ikki kundu droymt um at arbeitt fyri uttan.

Henrik Old (jv.)

Harra formaður.

Hetta var kanska eitt av teimum frægu uppskotunum av bunkanum, sum kom fram í dag, um eg fekk loyvi at lísið tvær reglur. Hesi hagtøl eru nú so ótíðarhóskandi, at tað ikki longur er gjørligt hjá politikarum ella almeningi at hava nakra hóming av, hvussu útviklingurin hevur verið í vinnubýtinum framvegis.

Nakað, sum eg havi saknað í hesum sambandi, og tað er eingin ivi um, at hetta uppskotið er í fínasta lagi, men eitt, sum eitur Løgtingstíðindi, tað haldi eg, løgtingsmenn hava øgiliga nógv brúk fyri, og eg veit ikki, um formaðurin hevur nakra peiling av, hvar ið knúturin liggur við, at hesi Løgtingstíðindi ongantíð komu fyri dagin aftur. Eg veit ikki, um kanska seinasti ræðari talari kemur nakað til hatta, ella kanska onkur annar. Eg havi roynt at spurt um nøkur ár aftur í tíðina, og tað skaffast ikki eitt Løgtingstíðindi, man er fullkomiliga lammaður tann sum ikki er stívur innan fyri hesi økini, og minnist væl aftur og ikki minst, tá ið seinasta samgonga sat, tað er ein ella annar knútur í, sum ger, at Løgtingstíðindi fullkomiliga hvarv. Tað kundi verið nakað at drigið fram í hesum sambandi nú, ið vit hava hesi hagtølini fyri, kanska seinasti ræðari talari visti okkurt um hetta. Takk fyri.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Viðvíkjandi seinasta spurninginum so er tað púra rætt, at tað hevur gingið striltið við at fingið Løgtingstíðindi til tíðina. Tað er vanligt, at tey verða boðin út á hvørjum ári nakað attaná, at ein tingseta er endað. Eg veit ikki akkurát, hvussu langt aftur, ið Løgtingstíðindi mangla, eg haldi næstan, at tað eru eini 2 ár. Nú skal tann mannagongdin broytast, haldi eg, soleiðis, at tað verður Løgtingsskrivstovan og møguligt tað nýggja Kunngerðarblaðið, sum koma at gera útgávuna heilt øðrvísi, enn hon hevur verið. Tí ein veikleiki við hesi bókini hevur verið, at hon hevur verið boðin út á hvørjum ári, og at tað hevur verið ógvuliga ymiskt frágingið.

Nú skal eg ikki frátaka mær sjálvum ein part av tí ábyrgdini, tað er rætt, men tann munurin er kortini, at tingmálini fáast, tað fæst fatur á upplýsingum um tingmál, tí, at tey eru øll til, meðan hagtølini, vit her tosa um, tey eru ikki til, og tað er rættiliga langt tíðarskeið aftur til 1977. Tað kann væl verða, at Henrik Old skuldi sett eitt uppskot fram um at fingið Løgtingstíðindi í eina fasta legu. Eg havi skilt tað soleiðis nú á Løgtingsskrivstovuni, at tað hevur verið gjørd ein roynd og tað verður gjørd ein roynd, saman við teimum, sum hava fingið Løgtingstíðindi til prentingar, tí tað hava verið ymsar prentsmiðjur í fleiri ár, so at tað er púra rætt.

Formaðurin

So eru tað ikki fleiri sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað, tað er einki uppskot um nevnd so málið fer beinleiðis til 2. viðgerð. Tingmál nr. 36 verður beint beinleiðis til 2. viðgerð.

So er tað 1. viðgerð av uppskoti til samtyktar um stovnseting av blaðmannaútbúgving í Føroyum, og so vildi eg skotið upp, at tað fær 1. viðgerð saman við demokratisering av útvarps-og sjónvarpsmonopolinum, sum allar

helst øll trý málini fara í somu nevnd. Um eingin mælir í móti tí, so er tað samtykt.

Óli Breckmann (ff.)

Eg skal ikki brúka nógva tíð upp á demokratisering av útvarps- og sjónvarpsmonopolinum, tað skuldi verið eitt rættiliga væl kent mál her í tinginum. Eg haldi, at ið hvussu so er sjónvarpsmálið hevur verið frammi eina ferð um ikki tvær ferðir fyrr, og tá hevur tað fingið rættiliga dygga viðgerð, sjálvt um uppskotið ikki fekk so góða undirtøku undir sjálvari atkvøðugreiðsluni, sum man kundi ynkst sær, og sum hetta málið hevur uppiborið.

Tað kann ikki verða nakar ivi um, at allir tingmenn, ið hvussu so er av og á, hava hugsað um, hvat arbeiði verður gjørt til dagligt fyri at fremja sjónarmiðini hjá teimum flokkum, sum hesir góðu tingmenn eru valdir fyri. Nú kann tað verða ymiskt, hvat menn trekkja av lessi. eg meini so við. Vit hava rættiliga fídnar politiskar framsøgumenn til dagligt, eisini í millum tingseturnar. Sverre Midjord situr her beint framman fyri mær, eg plagi at síggja rættiliga regluliga, bæði byrg og treyst innlegg frá Sverra Midjord og nevnliga tað, at menn hava áhuga fyri framløgu av sínum demokratisku sjónarmiðum, og útbreiðsla av teimum ger okkum í løgtinginum væl kvalifiseraðar til at fata týdningin av møguleikanum, sum liggur í hesum uppskotinum.

Dagspressan røkir eina demokratiska uppgáva í orðsins víðastu merking. Hon hevur tað ikki serliga lætt fíggjarliga av tí, at tær fíggjarligu umstøðurnar eru vánaligar. Tað er ein lítil marknaður og tað eru nógv bløð, men tað hevði verið berligt í hesum samfelagnum, um vit bara høvdu tað eina blaðið, har sum øll sjónarmið skuldi fingið innivist treytað av, at ein almáttigur blaðstjóri sum helst hevði havt eina tænastumannafunktión, hevði loyvt sjónarmiðnum innivist.

Vit vita, at útvarpið er eitt monopol eitt tíðindamonopol og tað monopolið hevur verið í gildi síðan 1957. Vit vita eisini, at hetta samfelagið er ómetaliga

nógv broytt síðan 1957 serliga á tí tekniska økinum, og tí er tað væl eitt sindur stuttskygt, ikki at vilja viðganga, um teir ikki vilja tað, tí eg trúgvi, at allir fata tað hóast alt, at tað er neyðugt við einari demokratisering, einari upploysn av tí restriktión, sum liggur í tí bara at hava eitt útvarp í landinum. Vit vita, at útviklingurin gongur burtur frá monopolinum.

Eg veit, at tað eru nógvir politikarar, sum kanska halda, at teirra áhugamál eru best kendar við einum slíkum monopolstovni, aðrir, haldi eg, hava fatað týdningin av, at t.d. ávís økir í landinum ella ávísir áhugabólkar í landinum fingu loyvi og umstøður til sínar egnu sendingar.

Tað sama er galandi fyri sjónvarpið. Vit hava eisini eitt monopol har, tað verður bara dýrari og dýrari at reka og minni og minni nøktandi, og tað fær minni og minni týdning eisini, tí fólk kunnu nú í størri og størri mun velja í millum tær sendingar, sum verða gjørdar av okkara egna sjónvarpsmonopoli og aðrar ofta nógv betri sendingar, sum verða gjørdar av útlendskum felagum og sendar í fylgisveini eisini til okkara. Býráðið í Havn hevur verið so framsíggið, at tað hevur ætlað at geva sjónvarpsfelagnum at umsita einar 6 sendirásir, sum verða lutvíst tiknar niður úr fylgisveinum um eina parabolstøð og so sendar víðari út um høvuðsstaðarøkið umframt at sjónvarpsfelagið kann fáa eina sendirás sjálvt, og hetta er eitt gott tiltak, haldi eg sjálvur, og átti at verið fylgt upp á aðrar mátar eisini soleiðis, at t.d. Javnaðarflokkurin fekk ella fakfeløgini ella kristiligar samtøkur ella aðrar samtøkur av einstaklingum og felagum høvdu fingið møguleika fyri at gjørt ella leiga sínar egnu sendingar og sent tær víðari. Tað hevði skapt eina líka fjøltáttaða sendiflatum, sum vit uppliva við blaðunum, sum hóast alt, haldi eg, røkja eina neyðuga uppgávu í samfelagnum, og tað trúgvi eg, at tingmenn skuldu verið teir fyrstu til at viðurkent.

At tað er neyðugt við útbúnum fólki til at arbeiða á slíkum stovnum, tað sigur seg sjálvt. Tá ið man hugsar um, hvussu stórt skúlaverið hjá okkum er blivið, og hvussu nógv tað kostar og hvussu stórar møguleikar tað

hevur, kanska ikki við einum blaðmannaskúla burtur av, men vit eini kombinatión av útbúgvingum, sum gjørdi tað møguligt hjá blaðfólki at fáa eina útbúgving bæði her og lutvist eisini aðra staðir í samráð vít blaðmannaháskúlar, sum eru í okkara grannalondum, so ívist eg ikki í, at hetta uppskotið fær eina góða viðgerð, eina positiva viðgerð í mentunnar og skúlanevndini.

Eg fari at heita á formannin og á tingið um at taka undir við, at hesi uppskotini fáa viðgerð í tí nevndini og har skal Fólkaflokkurin geva teimum eina góða viðgerð.

Takk fyri.

Signar Hansen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Eg taki undir við, at hesi málini verða viðgjørd í mentunnar- og skúlanevndini, og tað, sum eg serliga hefti meg við, er málið nr. 37 og tað, sum Óli hevur borið fram. Uppskotsstillarín sigur, at tað er tørvur á, at vit fáa eina blaðmannaútbúgving, og tað kann eg gevá honum rætt í, kanska serliga, tá ið man hevur lísið Dagblaðið, at tað hava vit brúk fyri. Nakað annað er tað, at eg veit ikki hví, vit skulu áleggja landsstýrinum nú at fara og arbeiða við hesum spurninginum, tí eg vænti, at uppskotsstillarin er vitandi um, at tað í dag verður arbeitt álvarsliga við júst hesum málinum. Føroya handilsskúli saman við tíðindastovninum Útvarp Føroya arbeiðir framvegis við at fáa loyst hetta málið og eg veit ikki, um uppskotsstillarin ikki er vitandi um tey viðurskiftini.

Takk fyri.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg má siga, at eg veit tað ikki. Tað hevur verið eitt hjartamál hjá mær sjálvum í fleiri ár, at soleiðis skuldi verða, og eg havi sjálvur skotið upp, vit hava havt fundir nevnliga í blaðmanna- og blaðútgevarafelag-

num, og útvarpið man hava verið við á slíkum fundum, hugsið eg, og vit hava júst tosað um tann møguleika, at handilsskúlin nevnliga kann verða uppi í eini slíkari útbúgving. Tað gleðir meg virkiliga nógv at hoyra, at tað er komið so væl áleiðis, tað var óført at hoyra. Eg vóni sum sagt, at hini uppskotini eisini eiga sømdir í nevndini og í tinginum, tá ið tey koma aftur úr nevnd, og eg rokni við, at Signar Hansen sum formaður í Tjóðveldisflokkinum eisini hevur áhuga hjá sínum egna floksblaði á hjarta, tí eg ivist ikki í, at málgagnið hjá Tjóðveldisflokkinum men kanska ikki hjá Føroya Javnaðarflokki, Sosialurin hevur slíkt fyri neyðini ella kundi havt ein fyrimun av tí, og nú kanska er hetta eitt serligt hjá mær av tí, at man lutvíst hevur sítt politiska virksemi aðra staðir enn í tinginum, og tað fer mangur arbeiðsdagurin til at geva blað út.

Eg kann gott siga tykkum eitt í gjøgnum formannin sjálvandi, at vit, sum arbeiða á bløðunum, hava eitt eitt so gott forhold til hvønn annan, at vit klippa skjúrtuna í helt ein seinnapart, um vit vita av, at okkara mótstøðumenn, konkurrentar, starvsfelaga ella líðilsfelagar úti á Argjum, niðri á Bryggjubakka, og hvar teir annars sita uppi á Hálsi. Um vit vita, at teir eru í trupulleikum og tað skal eg garantera tingmonnum fyri, at tað vinarlag, sum í neyðini ræður í millum bløðini, tað man sakna sítt síðustykki, tí tað verður ikki svikið á nakran hátt í millum bløðini heldur enn, tað verður svikið millum skip í havsneyð, tað skal eg garantera tykkum fyri, harra formaður.

Tað kann væl verða, at æraði tingmaður Jóannes Dalsgaard býtst í látur, hann kennir ivaleyst bara blaðarbeiðið frá eini grein, sum hann kortini var so beinasamur av senda út til blaðið møguliga fyri teirra skyld kanska eisini eitt sindur fyri sína egnu skyld, tað sigi eg ikki. Eg trúgvi, at æraði tingmaður sum situr og flennur niðri í salinum hevði ivaleyst kunna fingið eina glæði, ein fyrimun, ið hvussu so er kunna lært nakað av at studera, hvussu hansara floksfelaga úti á Argjum samstarva við sínar mótstøðumenn upp á Traðarvegi til dagligt, harra formaður.

Adolf Hansen (fr.)

Harra formaður.

Fyri 3 mánaðum síðan ella ikki ein gang tað, tá var ein long álvarsom grein í Dagblaðnum. Henda grein snúði seg um alt tað svans, fyri at brúka tey røttu orðini, sum har vóru nýtt, sum gekk fyri seg her á landi viðvíkjandi íløgum, og so varðv nevnt um allar skúlarnar. Eg fór so at hyggja eitt lítið sindur eftir hesum íløgunum, og talið passaði nokk so gott 2 mia.kr., men tað ljóðaði, sum um tað var upp á 1 ár hesar 2 mia.kr., tað varð einki sagt um, at tær vóru upp á 8 ár, tað er also 250 mió.kr. um árið, og tað haldi eg ikki verða nøkur stór íløga til eitt heilt land í skúlum og havnum og hvørt av sínum.

Nú kemur so eisin blaðstjórin, sum eisini er tingmaður, fyri sama blað, og leggur uppskot, sum eg fari at lesa við formansins loyvi: Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri, at sett verður á stovn blaðmannaútbúgving í Føroyum. Persónliga kundi eg mett, at tað verða 1 ella 2 blaðmenn, sum verða útbúnir um árið ikki stórt meir, ið hvussu so er, og eg havi einki í móti, at man fer at útbúgva tílíkt. Eg meini eisini, at tað er rætt at taka tað upp, men eg haldi bara ikki tað, at ein samgonga ella eitt landsstýrið, sum stendur og lorar fallrepið niður við lúnningini fyrí at fara í land, skal fáa álagt at koma við hesum her. Hetta skuldi verið komið í 1985, so var tað í lagi, nú beint áðrenn fólk fara á val at fara og koma við einum uppskoti um at seta eina heilt nýggja útbúgving á stovn, tað haldi eg er so burtur við harra formaður, at tað er heilt óhugnaligt.

Jóannes Dalsgaard (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Tað er ikki gott at vita, hvat liggur aftan fyri henda knappliga charmeoffensivin sum varð útfoldaður herfyri løtu síðan, tað skuldi nokk síggja út sum, at hann skuldi fyristilla tinginum, at tað ikki vóru nakrar spenningar ella nakar mótsetningur millum tey politisku

bløðini í Føroyum, og tað varð víst á alt tað frálíka tekniska samstarv, ið var millum bløðini, og tað er gamalt.

Eg arbeiddi á fjúrtanda sum ungur, falsaði Fjúrtanda, og so fór eg út og seldi Sosialin, tá eg hevði falsað Fjúrtanda. Tað var vanligt at lána Dagblaðnum pappír og læna papír á Dagblaðnum, men man skal ikki út frá hesum lata sèg forleiða til at fyristilla sær, at tað orðaskiftið, sum er millum bløðini, bara er spæl, ti tað snýr seg ikki um teknik Óli Breckmann, tað snýr seg um moral, pressumoral, og eg haldi, at tað snýr seg um at hækka pressumoralin í Føroyum, serliga innan fyri høgrapressuna, sum liggur á einum ikki serliga høgum støði, og kann man læra hægri pressumoral, kann man læra tað á einum blaðmannaskeiði, so er tað gott, so eiga vit at fáa tað. Tað er ikki bara teknikkur og at fáa eitt blað út, tað er also at betra um moralin, og tað má Óli Breckmann, sum hevur rekord í injurisak, eg haldi, at tað eru 12 sakir, ið hann nú hevur, tað má hann verða tann fyrsti til at erkenna, at tað treingir til.

Adolf Hansen helt ikki, at tað var basis fyri eini blaðmannaútbúgving, tað eri eg ikki heilt sikkur í, at hann hevur rætt í. Um vit samanbera okkum við Grønland, so hevur Grønland journalistháskúla og teir útbúgva 6-8 journarlistar hvørt ár, og tað hevur ikki staðið á, at útvega teimum arbeiði higartil. Tað, sum vit so skulu gera, er sjálvsagt at fegnast um tann nýggja áhugan í Fólkaflokkinum ella ið hvussu so er pørtum av honum at betra um pressumoralin og so annars at yvirláta tað til okkara góða landsstýri og fyrisiting og handilsskúla til saman við fróðskaparsetrinum og mediunum at gera hesa útbúgvingina, tað er tað, tað snýr seg um, harra formaður. Hetta var bara fyri, at man ikki skuldi lata seg tøla av Óla Breckmann til at blanda tølini saman, tað kundi verið líka við.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Tað ber ikki til at verða blaðstjóri uttan at taka

sjógvarnar við teimum sløttu siglingsleiðunum, og tá ið man hevur sitið har eini 14 ár, so hevur man helst upplivað eitt sindur. Tað eru ikki nógv, sum halda á, í so langa tíð sum blaðstjórar, er orsøkin er helst tann fíggjarliga marran, sum tað er, ein onnur orsøk er hetta deadlinesystemið sum nivir fólk ár um ár. Blaðstjórar hava ein miðallivialdur upp á 48 ár, so tað er ikki fyri bloytir Jóannes Dalsgaard, men tá ið Adolf Hansen fíltist á innihaldið í uppskotinum, so fari eg í treysti at vísa tí seinasta tilkomna liminum í hesí samgonguni til tað, sum Signar Hansen segði og tað, sum Jóannes Dalsgaard nú hevur bakkað upp, at tað er eitt arbeiði í gerð fyri at skapa hesa útbúgvingina. Hon nýtist ikki at kosta størvegis absolut ikki, vit kunnu brúka verandi facilitetir, men um nakar heldur, at hetta er ein nýggjur tanki hjá Fólkaflokkinum, so er tað ikki rætt harra formaður, tí at, sum eg segði, vit hava á fyrireikandi fundum upprunaliga tikið undir við uppskotinum persónliga, og flokkurin hevur eisini í síni nýútgivnu virkisskrá nevnliga hetta punktið við, so at vit fáa eina blaðmannaútbúgving í Føroyum, tað má verða rætt.

<u>Adolf Hansen</u> (fr.) viðmerking

Harra formaður.

Eg segði ikki, at eg hevði ímóti, at vit fingu hasa útbúgving. Eg segði bara, at eg helt, at tað segði nakað um álvarsemi í hesum, at ein tingmaður kemur við einum tílíkum uppskoti, meðan sitandi landsstýrið er við at lora fallrepið niður, tí teir skulu landa skútuna, og biðja teir so at seta eina blaðmannaútbúgving á stovn. Var tað komið fyri 3 árum síðan, so skilti eg tað, ella koma tað um ½ ár ella 3 mánaðir, so skilti eg tað eisini, bara ikki nú beint áðrenn val.

Í einum fyrra innleggi, nú hevur Óli Breckmann havt so nógv innlegg, segði hann júst hesi orðini: "Hetta hevur verið eitt hjartamál hjá mær í mong ár. Teir hava ikki tíð at ordna hetta. Seinastu tíð, teir hava, mugu teir brúka til at rudda upp har úti". Óli Breckmann fortelur í Dagblaðnum, hvussu óruddiligt tað

er í landsstýrinum í yvirførdum týðningi, og eg haldi, at vit skulu brúka hesa tíðina til at rudda upp í staðin fyri nú at fara út har og gera eina blaðmannaútbúgving í síðstu løtu. Eg skilji tað ikki.

Óli Breckmann (ff.) stutt viðmerking

Nú veit eg ikki um Adolf Hansen, síðsti æraði talari, ætlar sær eitt langt literert lív í føroyskum politikki aftaná, at hann er farin um fallrepi, bara tað ikki verður ein falllemmur hjá honum so skal hann verða glaður haldi eg. Tá ið vit so seint sum í dag hava viðgjørt uppskot eitt kostaði 11 mió.kr. og hevði nakað við Fróðskaparsetrið og Fiskirannsóknarstovuna at gera, eisini útbúgvingarmál, hetta kostar hóast alt einki í mun til tað uppskotið, tá ið vit hava havt uppskot um at keypa eina heila trøð, til ein gevaldugan almennan fyrisitingarbygning samstundis, sum sjónvarpið skal fáa nýggj høli, fleiri túsund kvadratmetrar at húsast inni á, so kann tað ikki verða nakað forgjørt í einum so moderatum uppskoti sum hesum her. Men tá ið man hugsar um tær lívsroyndir, sum síðsti æraði talari hevur havt í blaðnum Skrekk fyri skegg ella, hvussu tað at, so skilji eg væl, at hann hevur ein vissan skepsis fyri øllum ti sum hevur við blaðmannyrki, at gera, tað skilja vit væl, vit umbera hann.

Aðolf Hansen (jv.) stutta viðmerking

Harra formaður.

Hatta var nokk so stuttligt nú til seinast, men tíverri avføtt av byrjandi ilsinni, tað gerst bara ikki við. Hann tosar um faldreb, og eg skal bara upplýsa honum, at eg havi ikki stillað upp, og tað er ikki heilt avgjørt, um eg í heila tikið stilli upp, so tað kann ikki avgerast um lemmín enn.

So tosar hann um Fiskirannsóknarstovuna, har vil eg bara gera vart við, at tann útbyggingin er fult í gongd og hevur verið tað í longri tíð, øll tann útbyggingin. Hetta var bara eitt ískoyti til tað, sum er í

gongd fyri at ikki at stoðga upp, meðan landsstýrið verður skift.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg haldi, at ein so mentaður maður sum Óli Breckmann, sum hevur fylt nógv við seinastu tíðina, átti at vita, blaði hjá Adolf Hansen ikki kallaðist Skrekk fyri skegg, men Sjón fyri søgn. Takk fyri.

Formaðurin

So eru tað ikki fleiri sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er liðugt, og tað er uppskot um at beina hesi 3 málini í mentunnar- og skúlanevndina og tað verður so gjørt.

So kemur til viðgerðar stuðul til kanningar av nýggjum fiskivinnumøguleikum, tað er tingmál nr. 34. Hvør biður um orðið?

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Hetta er eisini eitt rættiliga lítilátað uppskot. Hetta er eitt uppskot, sum kortini man vera toliliga neyðugt, hugsi eg, tí vist ger landsstýrið eitt stórt arbeiði og hevur gjørt tað í nógv ár at útvega okkara hart trongda fiskiflota, sjómonnum og samfelagnum sum heild nýggjar fiskivinnumøguleikar. Tað verður gjørt á ymsan hátt lutvíst við at samráðast beinleiðis við útlendskar myndugleikar, stjórnarmyndugleikar, sum hava yvirræði á sínum egnu havleiðum, har sum føroyingar royna, og tað hevur verið gjørt við ymsum hegni. Serliga er tað núverandi løgmaður, sum hevur sitið sum stjórnarleiðari hjá okkum tað mesta av tíðini, sum tað hevur verið neyðugt at ferðast runt og útvega okkum fiskivinnusáttmálar.

Tað hevur verið vanligt at gjalda tær útreiðslur sjálvandi, sum standast av slíkum arbeiði, ferðingum úr landskassanum, tað sigur seg sjálvt. Tað kemur aftur

mangar ferðir í vunnum rættindum, men kanska hevði tað verið eitt hugskot, at fleiri vóru úti um seg og leitaðu og samráddust, av tí at tað er vorðið so vanligt nú á døgum við tí, sum kallast joint venture á útlendskum málið, eitt slag av samstarvi millum feløg, skipafeløg og fiskivinnufeløg, og tað er ofta neyðugt fyri at koma inn í fremmandan sjógv, at man arbeiðir saman felag, sum er í landinum og felag, sum ætlar sær at fiska i sjónum hjá hesum landi.

2 mió.kr. er ikki stór upphædd, tað átti ikki at verið neyðugt við eini slíkari játtan, av tí at ein fiskivinna sum soleiðis skuldi havt ráð at fíggjað sínar egnu kanningarferðir, sítt egna samráðingararbeiði og serliga, um man hugsar um, at ætlanin við hesum uppskotinum er at hava ein grunn, sum kann umsita hesar pengarnar, so tað verður forsvarliga húsast við teimum, at tey feløgini hava nógva limir, og at feløgini kanska áttu at havt eitt sindur av pengum. Eg meini Føroya reiðarafelag, kann man hugsa sær nakað, sum ljóðar meira av kapitalistiskari vælferð, tað skuldi verið smáting at trivið niður í ein grunn ella ein kassa ella eitt rakstraravlop frá í fjør ella rentur av limagjaldi og øðrum til at fíggja hvørja ferð, tað skuldi verið ella Føroya fiskimannafelag, sum skuldi havt eitt stort tal av limum, sum goldu sítt limagjald, og kanska havt aðrar inntøkur eisini, átt flakavirkir, átt skip og drivið tað sjálvir, av tí at teir altið vita so væl, hvussu skipini og virkini hjá øllum øðrum skulu rekast. Ella Skipara- og navigatørfelagið, sum umfatar fólk úr best løntu stattum í samfelagnum, men tað er nú tíverri soleiðis statt harra formaður, at sjálvt hesi feløgini, sum skuldu verið ímyndin av kapitalistiskarí makt, fíggjarmakt, fíggjarorku eisini eru illa fyri, eins og flestu aðrir stattir og flest aðrir tættir í hesum samfelagnum, nú tað bara sær út, sum tað er landskassin, sum bara hevur pengar at ráða yvir, og tí er tað helst neyðugt.

Eg fari at heita staðiliga á løgtingið um at útvega hesum feløgum møguleika fyri at fáa ein grunn soleiðis, at tað ber til at gera hetta arbeiðið saman við landsstýrinum, síðuleypandi við landsstýrisins arbeiði

sum ongantið kann undirmetast, tí tað er so týdningarmikið, og sum neyvan verður yvirgingið í týdningi heldur, sjálvt um hetta uppskotið verður samtykt.

Eg fari at heita á løgtingið um at fáa hetta málið til viðgerðar í fíggjarnevndini, av tí at tað fyrst og fremst er eitt fíggjarmál. Takk fyri.

Henrík Old (jv.)

Harra formaður.

Nú hava vit sitið er hesa hugnaligu løtuni her í kvøld, tað hevur bæði verið stuttligt og til tíðir rættiliga hugnaligt, so kundi man havt lyndi at tikið undir við øllum tí, sum kom fram, men hesaferð haldi eg, at tað er meira ivingasamt hesar av 2 mió.kr. sjálvt um talið gongur aftur. Tað var tað, tá ið man kom til ítróttin, tá hevði man 2 mió.kr., eg haldi einar 2-3 ferðir er man av tílvild dottin um hesar 2 mió.kr. men lat tað so fara. Her eri eg meira ivingasamur, tá ið tað kemur til hetta, fyrst og fremst tí at vit hava møguleikar frammanundan í rættiliga stóran stíl til at stuðla tílíkum ferðum, sum her er talan um, og um tað skal nógva seg um 2 mió.kr.

Nú stendur tað rættiliga ógreitt í grein 1 haldi eg hvat man sigur, um tað eru 2 mió.kr. pr. kanningarferð ella, man tosar um 2 mió.kr. um árið. Um tað eru 2 mió.kr. um árið, so kemur man ikki langan veg við teimum ferðum, sum eru gjørdar higartil, men tað eru pengar avsettir. Seinast haldi eg at tað var av teimum 260 mió.kr. einar 25 mió.kr. settar av til landsstýrið, sum tað var soleiðis leystligt við og har haldi eg, at nakrar av teimum ferðum, sum eru gjørdar higar til eru stuðlaðar við.

Annars eri eg ikki vísur í, um eg minnist rætt, men eg meini, at undir tíðini hjá Olaf Olsen var eisini ein grunnur upprættaður, um hann var upprættaður tá, tað eri eg ikki vísur í, men í øllum førum hava pengar verið avsettir har í gjøgnum nøkur ár, og tað var til royndir í fremmandum sjógvi. So hví man júst nú finnur út av, at nú skal man uppaftur hava tann triðja møguleíkan ella, fjórða ella hvussu nógv tað er, tað dugi eg ikki rætti-

liga at skilja. Her er tað landskassin sum skal gjalda gildið, og hesi 3 felǿgini Fiskimannafelagið, Skipara- og naviqatørfelgið og Nerðarafelagið skulu verða tey, sum siga gott fyri, ella býta út. Her er so ikki ætlanin, at landsstýrið skal hava nakað við tað býtið at gera.

Pengatrot stendur harra formaður, um eg fái lov at lesa úr viðmerkingunum. Pengatrot darvar skipaeigarum og yrkisfelagsskapum at ferðast uttanlands í teimum londum, sum vit náttúrliga kundu havt fiskivinnusamstarv við. Ein grunnur, sum hesin í uppskotinum, hevði givið monnum, ið hava gott skil á samstarvsmøguleikum, eitt høvi at slóða nýggjar leiðir.

So var tað talan um, at man skuldi hava eina frágreiðing við. Almont hevur man higartil sæð lítið til tær frágreiðingarnar. Allarhelst hevur landsstýrið fingið tær, sum gjørdar eru, men higartil er so einki skip komið avstað, men nú hoyrist, at tað nærkast, at man skal fara ein langan veg, og eg má siga, at um tað er kom ð so langt, at man er tvingaður til at fara á hina síðuna á verðini ella til verðins enda ella, hvar nú hetta gongur, tað veit eg ikki, so er tað hamiligt, tí at nú eru vit dottin niður á hesi hálvuni her norðuri, og mest møguligt skuldi man roynt at verið her á leið. Tað hevur borið til at livað her norðuri, men, sum eg skilji á lagnum, so meinar Fólkaflokkurin her, at nú byrjar at verða hopleyst at liva her á leið, men eg siggi ikki so svart upp á tað, sum Fólkaflokkurin ger ella, tað er Óli Breckmann í hesum førinum, tí tað eru møguleikar her í norðaru hálvuni enn, og tað tylgja nokk aðrir trupulleikar við, at man fer langt burtur til viðurskiftir, sum man yvir høvur ikki hevur ánilsi um, hvussu ið tað skal útvikla seg. Man skal hava fólk við, og man skal í øllum førum koma til fremmand viðurskifti, sum fyri teir, sum skulu standa fyri tí, kann skapa veldugar trupulleikar.

So at hetta talið upp á 2 mió.kr.,dum tað er talan um, at tað skal verða pr. ár, so er tað ikki tann stóri skaðin í tí, men vit hava sum sagt grunnar framnanundan. Menn hava verið í Argentina, menn hava verið í Canada,

og man hoyrdi eisini um eina nógv umtalaða ferð, sum var í Suðurafrika ella har á leiðini nú fyri kortum. Eg veit ikki, um tað er talan um tað, sum landskassin skal skoyta nakrar krónir uppí, men sum sagt, hesar 2 mió.kr. eru ein dropi í havinum av tí, sum tað kostar til hesar ferðirnar, sum hava verið higartil, og so hava vit sum sagt, um eg ikki minnist skeivt, henda grunnin, sum pengar eru í, til royndir í fremmandum sjógvi. Eg haldi, at hetta er rættiliga óneyðugt, sum tað er sett upp nú.

Formaðurin

So eru tað ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað Tað er uppskot um, at málið verður viðgjørt í fíggjarnevndini, málið verður beint í fíggjarnevndina.

Um eingin hevur nakað í móti tí, so verða tingmálini 1. viðgerð av tingmáli nr. 41: Vernd móti uppsøgn orsakað av felagslimaskapi, og tingmál nr. 35. Rentuágóðin av innistandandi frítíðarpeningi til løntakarar, tikin til viðgerðar undir einum, tað er tingmál 35 og 41. Hvør biður um orðið.

Óli Breckmann (ff.)

Harra formaður.

Nú skal eg ikki gera meg tvøran í kvøld. Eg má bara takka fyri tað vælvild, ið tingið hevur vist, at taka hesi uppskotini til viðgerðar í kvøld, og eg skal eisini takka formanninum, at hann so tolin situr og lurtar eftir. Eg skal ikki fara og gera vrøvl yvir eina samanlegging, sum hesa her, men eg fari harafturímóti kanska at tosa um uppskotini, siga nøkur fá orð um hvørt sær, um eg kann fáa loyvi til tað frá formanninum.

Fyrst nr. 35 viðvíkjandi rentuágóðanum av innistandandi frítíðarpeningi til løntakarar. Vit hava jú eina rættiliga nýggja lóg, sum eitur frítíðarløntin, lóg um frítíðarløn, og í tí lógini, eg havi hana liggjandi niðri á borðinum har, eg minnist ikki akkurát greinarnar, hvat nummar tær eru, men har verður sagt, at

frítíðarpeningurin verður goldin inn soleiðis, at yrkisfelagið hjá løntakarunum tekur í móti og umsitur pengarnar til teir verða útgoldnir, og at tað verður felagið, sum fær ágóðan av rentuni, sum sjálvandi í eitt ár verður tilskrivað hesum frítíðarpeningi. Tað kunnu verða rættiliga stórar upphæddir, sum soleiðis koma feløgunum til góða í einum ári, og sjálvandi unna vit einum fakfelag sum soleiðis væl tær inntøkur, sum tað fær.

Vit hava jú beint nú havt eitt uppskot, har vit tosaðu um, hvussu strævið ofta var hjá slíkum feløgum at fáa tað at mala fíggjarliga. Okkara samhugi er tí avgjørt við fakfeløgunum, tá ið tað kemur til rentuvinningin. Men hava vit ein samhuga við fakfeløgunum, so vil eg kortini leggja afturat beinanvegin, at okkara samhugi við teimum einstøku límunum í fakfeløgunum er upp aftur størri. Tað vil siga, at hetta uppskotið vigar bara upp í móti at lata tann einstaka lønmóttakaran ikki bara eiga ágóðan av sini frítíðarløn, sum hann sjálvandi skal hava, men eisini at fáa fyrimunin av rentuni, sum verður tilskrivað hesari frítíðarløn soleiðis, at tað verður hin einstaki løntakarin, og eg veit, hvussu nær hann stendur hjartanum á javnaðarmonnum. Tjóðveldissosialistar eru væl ikki vorðnir meira senilir enn so, nærsagt politiskt senilir sjálvandi, at teir ikki minnast teir veldugu dagar í 50-unum, tá ið flokkurin líkasum grundaði sítt eksistens á at vera ein fakfelagsflokkur. Tað var jú í teimum døgum, tá ið man hevði nakað við tann føroyska fiskimannin at gera harra formaður, ikki satt? Tað eru sjálvandi nógv Harrans ár síðani nú, men kortini.

Tað skal vera min vón, at tingið tekur undir við, at tað sjálvandi er tann einstaki løntakarin, sum eigur rættin til rentuna av tí frítíðarpeningi, sum tann einstaki løntakarin hevur rætt til sjálvandi.

Tað hevði verið ræðuligt, um knappliga løgtingsmannafelagið við t.d. Sverra Midjord sum formanni ella Ingeborg Winther sum formanni hevði lagt seg á rentuna av frítíðarlønini hjá t.d. sitandi tingformanni, men tað høvdu vit hildið verið "uhyreligt", at t.d. Øssur av Steinum, æraði tingmaður, misti part av tí rentu, sum

hansara hart vunna løn í løgtinginum t.d. fekk í kraft av tí lóggávu, sum er í tí praksis, sum er, ikki satt?

Tað er ikki annað enn tær sømdir, sum hetta uppskotið biður um, verða vístar løntakarunum í Føroyum, tað er alt. Hetta skuldi verið eitt rættiliga upplagt uppskot, harra formaður, sum tingið sjálvsagt í veldugari styrki tekur undir við, tað sigur seg sjálvt.

So koma vit til hitt uppskotið, harra formaður, nr. 41: Vernd móti uppsøgn orsakað av felagslimaskapi. Hetta er eisini eitt rættiliga týdningarmikið uppskot, kanska ikki júst økonomiskt, sum hitt er. Tað hevur kanska ikki júst dagligan týdning fyri hin einstaka fakfelagslimin, sum hitt fyrra uppskotið hevur, men principielt, harra formaður, so liva vit jú í einum samfelag, sum játtar seg til organisatiónsfrælsi, til frælsi at skipa feløg, frælsi at skipa fakfeløg, eins og vit hondheva onnur grundlógartryggjað rættindi. Men frælsi til at skipa eitt felag má væl eisini bera í sær frælsi til ikki at vilja vera í einum felag, tað skuldu verið tvær síður av somu medalju, harra formaður.

Vit hava tíverri í millum aðrar skeivleikar í hesum samfelagnum tað rættiliga primitiva fyribrigdið, at vit hava nakað, sum vit kalla ekskiusivsáttmálar. Nú havi sjálvur sitið sum gíssil í einum slíkum forholdi við ekskiusivum sáttmálum, nevniliga sum nevndarlimur í, sum formaður í Prentsmiðjufelagnum, og eg síggi, at Adolf Hansen, æraði tinglimur, fær eitt sovorðið innetið úttrykk í andlitið, eg veit eisini hví. Vit hava kempað lið um lið í Prentsmiðjufelagnum. Sosialurin hevur verið limur har. Stjórin har, Tórfinn Smith, og eg sjálvur hava stríðst øksl móti akslum fyri at vunnið okkum rættindi sum fakfelag, og kampurin hevur ferð aftan á ferð, ár um ár snúð seg um rættindini hjá hesum fakfelag at verið til uttan at følt seg sum gíssil hjá mótpartinum, sum kravdi ekskiusivar sáttmálar.

Vit vóru tíverri so veikir, tað er jú leikluturin hjá fakfeløgunum ofta, man stendur nokk so veikur, og tað er jú ein gomul søga, vit hoyra hana endurtikna ferð aftan á ferð av javnaðarmonnum, harra formaður, um veikleikan hjá fakfeløgunum, tað er púra rætt, eg kenni tað

á mínum egna kroppi. Eg veit eisini, at vit hava havt stríð ikki bara við Prentarafelagið men eisini innan fyri starvsmannafelag við ti almenna sum arbeiðsgevara, har man hevur havt hesa "uhyreligu konflikt" í millum løntakarar, henda veika løntakaran í Starvsmannafelagnum, ella Maskinistfelagnum ella Skipara- og navigatørfelagnum og hesa ræðuligu yvirmaktina, nevniliga hitt almenna, sum Hin føroyski javnaðarflokkurin stýrir.

Vit hava ferð eftir ferð havt verkføll, arbeiðssteðg, verkføll og stóran pengamiss fyri tey, sum minst hava ráð til at missa pengar, harra formaður, nevniliga løntakaran, og ti halði eg tað verða rætt at verja tann veika í samfelagnum til ta fríheit, sum er heilt náttúrlig í einum demokratiskum samfelag, nevniliga at viðkomandi stendur fríur, antin hann vil vera limur í einum fakfelag, ella hann vil vera limur í einum øðrum fakfelag, og tað má undir ongum umstøðum verra hansara umstøður sum fullgildugur borgari í samfelagnum.

Eg eri vissur í, at hetta má vera galdandi antin tað er av átrúnaðarligum orsøkum ella av fakligum orsøkum ella politiskum orsøkum, so má hetta vera rætturin hjá tí einstaka, at siga, um so er,- og tit hava tað sama í Danmark, harra formaður,- at ein limur í einum donskum fakfelag sigur, eg vil ikki at mítt limagjald skal fara til at gjalda fyri undirskotið hjá t.d. Aktuelt, so má viðkomandi hava ta fríheit at kunna avgera yvir síni egnu lagnu.

Vit hava fleiri dómar í altjóða arbeiðararættum, í mannarættindarrættinum í Strassbourg, har sum arbeiðarar, sum hava viljað staðið uttan fyri ein felagsskap, men sum eru uppsagdir orsakað av tí, at teir skulu verða inni í felagsskapinum eftir kravi frá báðum síðum, teir hava vunnið í hesum rættarmálunum. Fyri nettup at undirstrika, hvussu breiða undirtøku hetta uppskotið sjálvandi fær í løgtinginum, so havi eg í viðmerkingunum nettup víst til partamannin enntá formannin í móðurflokkinum hjá sitandi tingformanni og hjá javnaðarflokkinum á løgtingi, nevniliga Svend Auken, sum var tann maðurin, sum í fólkatinginum legði hetta uppskotið fram í sínari tíð, og tað fekk sjálvandi eina rungandi undir-

tøku frá einum meira ella minni samdum fólkatingi.

Hetta er jú ein grundleggjandi mannarættur harra formaður, og tað er eisini í tráð, sum eg segði, við § 11 í europæisku konventiónini um mannarættindi. Eg kann gott senda rættarnevndini, sum eg skjóti upp, fær hetta uppskotið til viðgerðar, meðan arbeiðsmálanevndin eigur at fáa uppskot nr. 35 til viðgerðar, um rættarnevndin ikki eigur ST-viðtøkurnar, og viðhvørt heldur man, hon eigur tær ikki, ella mannarættindarviðtøkurnar hjá EF í einum vøkrum og klárum avriti, tá ið hesi uppskotdni fáa viðgerð í teimum báðum nevndunum. Takk fyri harra formaður.

Sverre Midjord (jv) viðmerking

Harra formaður.

Tað verður bara meira og meira skemtiligt at vera her í kvøld. Eg skilji, at Óli er eitt B-menniskja, hann vaknar út á kvøldið, har onnur, sum mugu fara upp kl. 5 um morgunin fyri at gera nakað til nyttu í samfelagnum, eru við at sovna, men so leingi Óli kann upptræðka her á slappari línu, so gongur tað nokk.

Vit, sum vóru her, tá ið frítíðarlønin hjá arbeiðsfólkinum varð viðgjørd, minnast orðaljóðið hjá Óla Breckmann, har hann segði, at pengarnir lógu betri í kassanum hjá arbeiðsgevaranum enn í lummanum hjá arbeiðaranum. Soleiðis var orðaljóðið her á tingi frá fólkaflokkinum, og hvat ið arbeiðarafeløgini gera við rentuna av ti vunna peninginum viðkemur ikki Føroya løgtingi. Tað er at grípa inn í demokratiið, at vit skulu avgera, hvat ið arbeiðarafjøldin ger við sínar pengar, tað er ódemokratiskt. Nú hevur Fólkaflokkurin í alt kvøld tosað um demokratiið, so teir fáa okkum næstan at trúgva, at teir eru demokratar.

Hvat ið Svend Auken og Óli Breckmann hava hundsað við niðri í fólkatinginum, viðkemur ikki mær, yvirhøvur ikki, eg taki yvirhøvur ikki dagar í millum tað, tí teir kunnu næstan vera ein alin út av sama stykki. Tí at danskur politikkur og føroyskur politikkur er hvør sítt.

Óli Breckmann hevur faktisk gloymt tað, at hann umboðar Føroyar niðri á fólkatingi, tí ferð eftir ferð dregur hann ting frá løgtinginum niður í fólkatingið, og nú hevur hann vent um, nú hálar hann fólkatingið niðan higar. So antin vil maðurin sova, ella er hann heilt í ørviti, og haldi, tað er tað seinna. Takk fyri harra formaður.

Óli Breckmann (fl) viðmerking

Harra formaður,

Eg haldi, at síðsti ræðari talari ger mær órætt, tá ið hann citerar meg frá tí, at lógin um frítíðarpening var til viðgerðar. Tí havi eg havt orðið í tí málinum, so nú minnist hann ivaleyst betri, enn eg sjálvur geri, tað kann vera ørviti, tað kann vera svøvnur, tað er púra rætt, tí at vit, sum arbeiða frá tíðliga á morgni til seint á kvøldið Sverri Midjord, vita, at tað er strævið, tað er púra rætt, hann sjálvur, tað er strævið.

Men eg kann hava sagt, og eg meini tað, eg skal endurtaka tað eisini, at Fólkaflokkurin meinar, at pengarnir altíð liggja betri í lummanum hjá tí einstaka løntakaranum enn hjá fakfeløgunum og tí almenna. Teir organisatorisku bossarnir vita betur, hvussu rentan hjá løntakaranum verður brúkt, enn løntakarin sjálvur veit tað, tí tað, kann eg hugsa mær, er ein royndur lutur, tað meinar kanska Javnaðarflokkurin, eg veit ikki, um hann ikki ger tað, havi eg lisið hann skeivt. Fólkafloksins sjónarmið er fullkomiliga krystalklárt, tann einstaki løntakarin veit nógv betur, hvussu hansara egnu pengar verða brúktir, enn hitt almenna veit tað, og enn at fakfelagsleiðslurnar vita tað.

Takk fyri.

Sverre Midjord (jv) viðmerking

Harra formaður.

Fólkaflokkurin segði, at við at broyta viðurskiftini, at frítíðarpeningurin skuldi deponerast hjá fakfelagnum, tóku vit grundarlagið undan tí fíggjarliga

stuðuli, sum frítíðarlønin var hjá arbeiðsgevarunum. Tað var sagt ner frá hesum røðarapalli, og tað er rætt, eg skal viðganga tað, at arbeiðsfólkið má sjálvt avgera, hvat tey gera við sínar pengar og sínar rentur, tað skal ikki nakar løgtingslimur hvørki úr Javnaðarflokkinum ella Fólkaflokkinum avgera tað. Tað skulu fakfeløgini sjálvi avgera, tað finna tey útav.

Fólkaflokkurin segði her, at pengarnir vóru tryggleikin fyri fíggingini hjá arbeiðsgevaranum, tað var sagt her av røðarapallinum.

Óli Breckmann (ff) stutt viðmerking

Harra formaður.

Her hava vit so ein møguleika eisini síðsti æraði talari at broyta mistøk frá fortíðini. Vit hava nú møguleika at rætta løntakarunum eina hond og siga, ger so væl vit líta løntakaranum til at vita, hvussu rentan av frítíðarpeninginum best kemur løntakaranum til sættis.

Sverre Midjord (jv) stutt viðmerking

Harra formaður.

Tað er júst tað, vit hava gjørt við at lata tey fáa frítíðarpeningin, og tey skulu í fakfeløgunum avgera sjálvi, hvat tey gera við sínar egnu pengar. Tað skal ikki Óli Breckmann ella Sverre Midjord avgera, hvat ið fakfólk skulu gera við sína rentu.

Óli Breckmann (ff) stutt viðmerking

Tað er júst løgtingið, sum í síni tíð avgjørdi fyri løntakaran, at leiðslurnar í fakfeløgunum skulu avgera yvir rentuni. Hetta uppskotið gevur okkum aftur ein kjans at geva løntakaranum yvirvaldsrætt yvir rentu av síni egnu frítíðarløn. Tí eri eg vísur í, at Sverre Midjord er millum teirra, sum atkvøða fyri hesum uppskotinum.

Sverre Midjord (jv) stutt viðmerking

Tað er ikki leiðslan í fakfeløgunum, sum skal avgera, hvat rentan skal brúkast til, tað skal hvør einstakur limur, sum eigur sína rentu, og tað hava teir gjørt í fakfeløgunum.

Adolf Hansen (fr)

Harra formaður.

Vit hava tvey uppskot her frá Óla Breckmann, sum eg vil siga, um tey vóru komin fyri 3 árum síðan, so høvdu tey verið áhugaverð, men av tí at tey koma nú á "læbe", sum danskararnir siga, so vil eg siga, tey hava ikki stóran týdning, og tað er kanska dumt harra formaður at taka orðið í hesum. Tað kann jú henda, at Óli Breckmann kemur við teimum aftan á eitt val aftur, tað er ikki tí, tað vænti eg nú ikki, men so kundi tað verið áhugavert at gjørt nakrar viðmerkingar til hetta.

Fyri tað fyrsta er tað um rentuágóðan av innistandandi frítíðarpeningi til løntakaran. Mær vitandi er tað ikki nakað uttanífrá, sum kemur inn í fakfeløgini at avgera, tað eru limirnir sjálvir, sum velja eina leiðslu, og um henda leiðslan so avgerð, at rentan skal tilfalla felagnum, so er tað væl í lagi. Tí um limirnir ikki ynskja tað, so verður tað bara fyri tað eina árið, so skifta teir leiðsluna út. So har hugsi eg, at tað er ikki so nógv hjá Óla Breckmann at verða bangin um.

Tað ljóðar, tá ið man hoyrir Óla Breckmann, sum um limirnir í fakfeløgunum er eitt, og leiðslan er nakað, sum kemur uttanífrá, nakað sum ikki kann flytast, nakað massivt nakað, sum limirnir onga ávirkan hava á, og tað er harmiligt, at ein so, ja, onkur nevndi tað í áðni, høgt mentaður maður sum Óli Breckmann ikki skal vita betur enn tað, at tað er sum um, tað er nakað, sum bara er har, leiðslan verður vald av teimum einstøku limunum. Tað vil siga, at tað, sum leiðslan avger, er jú avgerð limanna.

Eg skal ikki siga meira um hatta við rentunum, men

so hava vit eitt uppskot her, eg fari at biðja formannin um loyvi til at lesa okkurt petti burtur úr. Her stendur, "arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønmóttakara, tí hesin er limur av einum telag ella av einum ávísum yrkisfelag", tað er í og fyri seg í lagi, hatta er gott.

Tað eru heilt nógv ár síðani, at ein føroyingur, sum arbeiddi við statsministeriið, sendi mær eitt kopi av hesum lógum og bað meg leggja tær fyri tingið. Eg fall fyri hesum her eina kapitlinum, restin les tað. Eg síggi væl, at hetta er eitt danskt uppskot, sum er umsett til føroyskt uttan at hugsa um tað, umset mær hetta her, so hevur ein ella annar sitið og umsett hetta. Men royn og les restina. Um vit fara niður á stk. 2, har stendur: "arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein løntakara, tí hesin ikki er limur av einum felagsskapi ella av einum ávísum yrkisfelag", hatta er beint mótsatt av tí fyrsta. Tað eina er, um tú ert limur, so kanst tú ikki sigast úr starvi, og um tú ikki ert limur, so kanst tú heldur ikki sigast úr starvi. Tað vil siga, tú ert bundin til ævigar tíðir hjá einum arbeiðsgevara, antil ert tú limur, ella tú ikki ert limur, í hvørgum førinum kanst tú sigast úr starvi.

So kunnu vit blaða yvir á næstu síðu, har stendur: "tá lønmóttakari verður gjørdur kunnugur við, at limaskapurin er ein treyt fyri framhaldandi av setanini í virkinum, kann stk. 1 ikki nýtast", heilt óskiljandi, heilt einfalt, tí at umsetarin sjálvandi ongan áhuga áhuga hevur fyri hesum málinum. Lesa vit so við formansins loyvi tann danska tekstin so stendur: "stk. 1 finder endvidere ikke anvendelse, når en lønmodtager, der er medlem af en forening, efter ansættelse gøres bekendt med, at mediemsskabet er en betingelse for fortsat ansættelse i virksomheden". Hatta er ein heilt annar tekstur.

Hetta minnir meg so nógv um vallógina, sum eg meldaði flokk eftir, hvar ið teksturin var púra hvør sín í tí danska og tí føroyska, hetta er so púra, púra hvør sítt, ið har stendur, og eg skal ærliga viðganga, nú er tað framlagt í dag ella í kvøld, eg las tað ikki longur

enn hartil. Men hatta segði mær, at scleiðis, sum uppskotið er útformað nú, kann eg ikki taka undir við tí, men § 1, "arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi lønmóttakara, tí at hesin er limur av einum felag ella av einum ávísum yrkisfelag", hatta kann eg tó við einum ávísum fyrivarni taka undir við, tí tað kemur ann upp á, hvat felag, tað er. Men um tað er lønarligt felag, og hann er í tí, tá ið hann kemur inn, og tað er vitandi, men at man skal verða bundin, tað, trúgvi eg, er at grípa ov nógv inn í frælsið hjá arbeiðsgevaranum ella kapitalistinum, sum hann varð nevndur í áðni.

Óli Breckmann (ff) viðmerking

§ 1 í uppskotinum er, at arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønmóttakara, tí hesin er limur av einum felag ella einum ávísum yrkisfelag, tað er greitt nokk, tað er púra rætt.

§ 2 virkar bara mótsatt, at arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønmóttakara, tí at hesin ikki er limur í einum felagsskapi ella í einum ávísum yrkisfelag. Hatta er bara tann greinin, sum útilukkar ein eksklusivan sáttmála, so einfalt er tað. Tað vil siga, at ein arbeiðsgevari kann ikki siga úr starvi ein lønmóttakara, lat okkum siga, at prentsmiðjan hjá Adolfi kann ikki siga úr starvi einum løntakara á virkinum av tí, at viðkomandi noktar at verða limur í prentarafelagnum, um virkið hjá Quick Print er limur í prentsmiðjufelagnum, so einfalt er tað.

Viðvíkjandi hinum uppskotinum harra formaður, so fari eg at gera vart við, at rentutilskrivingin nú kemur fakfelagsleiðsluni til góða, orsakað av løgtingslóg um frítíð við løn. Har stendur í 4. kapitli, um eg kann fáa loyvi at citera tað, harra formaður, 2. stk. "Frítíðarlønin fellur til gjaldingar samstundis við lønini, og verður goldin viðkomandi løntakarafelag ella, um einki urboðandi løntakarafelag finst, frítíðargrunninum í varðveitslu, til frítíðin kann halðast". Tað er ikki tí, at fakfelagslimirnir hava avgjørt hetta harri Sverre

Miðjord, men tað er tí, at landsstýrið við makt hevur samtykt, at fakfelagsleiðslurnar skulu hava pengar til at dríva sítt virkisemi fyri, og so má vertin liggja á løntakarunum, hesum neyðars einstøku linunum, sum einki formár sær undir damptrumluni, fakfelagsleiðslurnar eru.

Sverre Miðjord (jv) stutt viðmerking

Harra formaður.

Teir vóru meira undir damptrumluni, tá ið teir skuldu heva pengarnar, og eingir pengar vóru, tí firmaini vóru farin av knóranum og firmaini høvdu brúkt frítíðarpeningin.

Tað er ikki leiðslan, sum skal brúka rentuna. Á hvørjum aðalfundi, tá ið tú harra háttvírdi løgtingsmaður Óli Breckmann sigur, at tú ert limur í einum fakfelag, so veitst tú, at aðalfundurin er hægsti myndugleiki, og á hvørjum aðalfundi skal aðalfundurin, limirnir avgera, hvat ið pengarnir skulu brúkast til, tað er ikki leiðslan, tú ert skeivt orienteraður, so tú mást heldur fara at lesa uppá.

Adolf Hansen (fr) stutt viðmerking

Harra formaður.

Tað er ymiskt komið fram her í kvøld, sum vísir, at tað knípur við annaðhvørt orientering ella minninum hjá uppskotsstillaranum.

Sjálvandi tá ið man skal koma við 21 uppskotum á einum og sama fundi, tá kann tað kanska verða "lidt af hvert".

Hann er fleiri ferðir komin inn á mítt arbeiði innan fyri prentiøkið, og eg kann upplýsa Óla Breckmann, at partafelagið Quick Print hevur ongantíð søkt um limaskap í prentsmiðjueigarafelagnum, men tað gjørdi móðurfelagið hjá partafelagnum Quick Print, tað sum eitur Color Print, og fekk eitt kortanei, tað kalli eg fyri at vera ein øksklusiv avtala in extention.

Formaðurin

So er orðaskiftið liðugt.

Løgtingsmál nr. 41 verður beint til viðgerðar í rættarnevndini, og løgtingsmál nr. 35 verður beint til viðgerðar í arbeiðararmálanevndini.

So kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 27: Uppskot til samtyktar um lækking av skattatrýsti, og um eingin hevur nakað í móti tí, tingmál nr. 28: Uppskot til samtyktar um hækking av persónsfrádrátti.

Óli Breckmann (ff)

Harra formaður.

Eg takki fyri vælvildina aftur. Sjálvandi skal eg ikki vera tann, sum kom við nakrari innvending, tað er "lutter" takksemi í kvøld.

Harra formaður, lat okkum fyrst taka nr. 27, av tí at tað er tað lægra nummarið, annars ikki nøkur preferanca, eg eri glaður fyri allan tann stuðul, sum uppskotini fáa, men hetta uppskotið er faktisk inspirerað av tí, sum hendir í okkara grannalondum í hesum døgum, har ið serliga Ísland er kanska tað feskasta dømi, men Danmark hevur eisini verið inni á tí sama, tað at landsins ábyrgdarpolitiska leiðsla sigur, hetta hundalívið ber ikki til meira. Tað ber ikki til at liva í einari konstantari skrúvu. Tit skulu síggja ein hund berjast við seg sjálvan í túninum, hann elskar at býta seg sjálvan í halan og støvrokið stendur hægri og hægri, jú meira ferð hann fær á, jú meira hann glefsar eftir hesum her halastumpinum. Men Ísland hevur longu higartil í ár devaluerað krónuna minst tvær ferðir, og teir ætla at gera tað triðju ferð, um teir ikki hava gjørt tað. Teir umhugsa álvarsliga eftir ráðum frá altjóða búskaparligum felagsskapum at lækka lønarútreiðslurnar, av tí at lønarútreiðslurnar leggja jú kostnaðarniveauið á framleiðslu bæði til heimanýtslu og til útflutnings.

Tá ið man so hugsar um, at Ísland ætlar at lækka sínar lønarútreiðslur samstundis sum, at løntakarin fær eina samsýning, eitt endurgjald í form av eini tilsvar-

andi lækkan í skattinum. Tá ið man hugsar um harra formaður, at Ísland hevur eitt lønarlag, sum bara liggur uppi á helvtini av okkara lønarlag, og t.v.s. hevur eitt kostnaðarstøði, sum alt annað líka bara er heltin av okkara kostnaðarstøði, so eri eg vissur í, at serliga hetta landsstýrið, tá ið man hugsar um tann prís og lønarútvikling, sum hevur verið í hesum landsstýri, sær virði í einum uppskoti sum hesum. Meðan íslendingar koyra sín fisk, sína útflutningsframleiðslu út á heimsmarknaðin við eini tímaløn upp á einar 35-37 kr. haldi eg, at hon í Namibia er 7 kr. um tíman. Nú var onkur so beinasamur í áðrið og minti meg á møguleikar, sum hetta samfelagið hevði, men sum tíverri vórðu kubbaðir av stokkinum, so er tað púra greitt fyri øllum tingmonnum, at vit ikki kunnu halda fram í verandi líki. Tað má koma ein justering niðureftir, Adolf Hansen hevur brúkt orði fallreb, og tað fær okkum, ið hvussu so er, at hugsa um eina lækking, sjálvandi falllemmur, tað er so drastiskt, men um vit ikki duga at skilja týdningin av fallrebinum, tá ið tíðin er komin til fallrebið, ja so endar tað við einum fallemmi, tað er púra upplagt.

Eg skal ikki siga stórt meir um tað, tað miðar ímóti, at vit gera tað møguligt hjá tí einstaka løntakarinum at taka eina lækking í lønini treytað av, í kravt av, at útreiðslustøðið hjá viðkomandi lønatakara lækkar tilsvarandi.

Her mugu vit síggja í eyguni, at tað almenna má og skal ganga undan, tað almenna hevur lykilin til eina slíka dupulta lækking. Tað almenna kann siga við løntakararnar, løntakarafeløgini, vit gera tað bíligari at liva, vit seta skattatrýstið niður, vit lora úr landskassanum, lata nakað aftur úr landskassanum, sum landskassin hesi síðstu árini hevur lagt sína køldu, krámandi hond á, harra fornaður, niðri í lummanum á hvørjum einstøkum skattgjaldara. Tað er ikki annað enn rimiligt, at tað almenna letur útaftur nakað av tí sum tað hevur beslaglagt. Nú havi eg nevnt eitt tal sum 10%, tað kann verða 15% tað kann verða 30%, men endamálið má so verða tað, at tað verður bíligari at liva hjá tí einstaka, og at kostnaðarniveauið í samfelagnum tí flytir niður, vit

eiga at kunna verða so mikið rúmligur. Nú er landskassin so enormur, landsstýrissamgongan hevur í dag framvegis tosað um eitt avlop í 1988 av á rakstri landskassans, so máttu vit havt ráð til, vit máttu unt eisini tí føroyska løntakaranum at fingið 200 mió.kr. irnaftur í sín part.

Harra formaður. Viðvikjandi hinum uppskotinum, har er ikki so nógv at siga. Eg havi so mangan hugsað um tað, hvørja ferð man fer og rindar sítt limagjald, tí man hugsar sum so, at man er jú fólkavaldur, man hevur eins skyldu kanska fram um tað, sum onnur føla á sær, av tí man hevur tað borgarligu álitisstøðu, sum man hevur, at man betalur nógv limagjøld til ymisk vælgerandi feløg, og eg eri vísur í, at vit kenna tað allir samlir. Nú eru ongar kvinnur her í kvøld, men tær hava helst akkurát tað sama, kanska eitt ella tvey kvinnufeløg, sum ikki hava, men alíkavæl, umstøðurnar eru tær somu, okkum nýtist ikki at reksa tær upp. Men eg vil kortini mæla til, at tá ið nú hetta uppskotið er samtykt, og fyrisitingin skundar sær undir at gera eina lóg, sum er í tráð við hetta uppskotið at so landsstýrið ger ein lista yvir tey feløgini, sum kunnu verða uppi í teimum fyrimunum, sum standast av hesi lógini, eisini fyri feløgini, eisini fyri tann einstaka. 1000 kr., tað er ikki nógv, tað vita vit, men tað røkkur ið hvussu so er til eini 10 limagjøld, kanska fær Psoreasisfelagið 1000 limir meir, Sukursjúkufelagið 1000, Hjartafelagið 8000, øll ræðast mest hjartasjúkur tað eri eg klárur yvir, harra formaður. Eg sat nevnliga og hugdi eftir nesinum í løgtinginum í dag, og sjálvur føli eg meg eitt sindur tungan á sporinum eisini, tá eg gekk niðan gjøgnum Krókabrekkuna, so nikið meir hastar eitt slíkt uppskot harra formaður. Vit hava eisini brúk fyri tí sjálvir persónliga, tað eru ikki allir, sum tuska og renna eftir kjóçvum og kjøti, tað eri eg klárur yvir. Eg vildi ynkst, at eg sjálvur gjørdi eitt sindur meir av tí, so hevði eg kanska verið tey pundini sunnari, men Krabbameinsfelagið er eitt, og so hava vit onnur feløg, ið áttu at fingið lut í hesum, so hetta skuldi verið eitt uppskot, sum sjálvandi fekk ein veldugan meiriluta.

Takk fyri.

Heini O. Heinesen (tf.)

Harra formaður.

Tað hevur verið sera áhugavert at lurta eftir undanfarna røðara í kvøld. Hann hevur verið ógvuliga romantiskur við sínum framførðslum, tað er alt ógvuliga ljósarreytt, sum hann førir fram. Hann tosar um lønarlagið og um at lækka skattatrýstið, eg kenni einki til, at skattatrýstið er hert í hesi samgonguni. Tað er gott nokk ein avgjaldslóg komin upp á olju, og útreiðslurnar upp á olju eru farnar langt niður. Um hann lesur grundarlagið til prístalsútroknингina so er tað fari heilt langt niður og realløniн er hækka við 17%.

Tann, sum altíð er syndabukkurin í øllum, er altíð tað almenna, og tann stóri fíggindin, um vit ikki skulu brúka onnur orð enn hatta har í øllum hesum her, tað er samfelagið, tað skal alt vendast móti samfelagnum. Tað, sum stýrir lønarlagnum, hetta er ein gomul náttúrlóg, tað eru íløgurnar, íløgurnar krevja arbeiðspláss og arbeiðsmegi. So er tað upp til arbeiðaran og arbeiðarafeløgini, hvussu dýrt teir vilja selja sína arbeiðsmegi, jú meir tørvur er á arbeiðsmegi, jú dýrari kann man selja tað. Um tað ikki manglar fiskur á marknaðinum, so fær man ikki nógv fyri hann, tað er á sama hátt við arbeiðsmegini, og tað er tað, sum er við at henda í Føroyum í dag, tað eru íløgurnar, tað eru tær, sum skuldu verið tálmaðar í góðari tíð.

Vit liva í einum fríum samfelag, man tosar um borgarligan politikk, libralan politikk. Hilmar hevur verið serliga nógv inni á hasum, og tað, er tað sum stýrir øllum hesum her, tað eru ikki politikararnir, sum koma at stýra hesum. Tá ið tað er tørvur á arbeiðsmegi, so má man bjóða tað fyri tað, fyri at fáa tað. Vit vita tað "immervekk", at tey, sum eru í almennum størvum í dag, tey fara í privatu vinnuna, tí tey fáa dupult so nógva løn, sjálvt um skatturin er nakað hægri av tí. Tað er tað, sum hendir í øllum hesum her. Sjálvandi er tað ein góður tanki, tá ið tað er í framleiðsluvinnuni, at lønarlagið liggur lægri, og man lækkar skattin. Eg havi einki ímóti, um tað verður gingið tann vegin, men tað

eru nakrar lógir, sum eru náttúrlógir í einum samfelag, og eg trúgvi ikki, at man kemur uttan um hatta har, um man heldur fram at gera íløgur í at fáa meir arbeiðspláss, um tað manglar arbeiðsmegi.

Óli Breckmann (sf.) stutt viðmerking

Harra formaður.

Nú er tað ein gylt regla her í lívinum, at man altið skal royna at síggja ljóspunktini, tað góða, tað positiva. Vit kenna jú munin millum pessimistin, sum ein kláran sólskinsdag gremur seg um tað lítla skýggið í havsbrúnni, meðan optimisturin, sum vit eiga at verða, sær tann lítla glottan á tí kolsvarta himlinum ein ódnardag. Eg fekk nevnliga eyga á ljóspunktið við tí, sum síðsti æraði talarin sigur, at sjálvandi skal tað og kann tað almenna eisini gera sín part, tað er púra rætt. Útboð og eftirspurningurin á arbeiðsmarknaðinum hevur stóran týdning, íløgutrýstið ella íløguhugurin stóran týdning, absolut. Tað sum eg legði merki til, at tað almenna kann og átti eisini. Um vit hugsa um, at tað varð við einum bresti 15.000 kr. pr. húsarhald dýrari at liva fyri 2 árum síðani eini 7000 kr. pr. løntakara um árið, ja 200 mió.kr. dividerað við tali á løntakarum, tað gevur júst hetta talið har, so tað er ikki nakað, sum vit fara at kjakast um, tað hava vit ikki tíð til heldur, nevnliga tað, at Heini O. Heinesen hevur viðurkent, at leikluturin hjá tí almenna átti at verið í hasum har, tað er ljóspunktið í kvøld.

Sjálvt um prisvøksturin ikki hevur verið so stórur í hesi samgongu m.a. orsakað av oljuprísinum, so kunnu vit sjálvandi fara aftur um hesa samgonguna, og vit kunnu eisini líka sum byggja niður tað press, sum er lagt á kostnaðin av rakstrinum av hesum samfelagnum, við at fara longur aftur og siga, ja, men vit kunnu eisini rætta og dempa tann lønar- og prisvøkstur sum var, áðrenn henda samgongan tók við. Tað skal eg eisini verða við til.

Henrik Old (fv.)

Harra formaður.

Tað er nokk so áhugavert at hoyra nú. Nú hava vit upplivað í 3 ár, at ein maður, serliga ein, sum er Óli Breckmann, sum í kvøld ríviliga hevur tikið til við uppskotum.

Nú tosar hann um, at tað er munur pessimistum og optimestum. Eitt má eg siga, at eg havi ongatíð verið úti fyri í mínum livi, hvar ið eg fleiri ár havi verið saman við einum manni sum er so pessimistiskur, sum hesin maðurin er, sum nevur lagt hesi uppskotini fram, ongantíð. Sjálvt teir sum maðurin segði, sum hava sæð myrkur á alljósum degi, hava ongantíð verið so svartskygdir sum Óli Breckmann hevur verið hesi 3 árini. Alt, sum er farið fram her, líka mikið hvat tað er, alt hevur verið hopleyst, alt hevur verið svart. Slíkum ljósasløkkjara skal man leita langt og leingi eftir fyri at finna.

Skuldi bara ein lítil brotpartur av tí verið komin igjøgnum, sum Óli Breckmann hevur fyrisligið og Fólkaflokkurin hevur fyrisligið, so er heilt víst, at so skuldi man longur enn niður í lumman hjá skattgjaldaranum, so nyttaði lítið at grava í lummanum hjá skattgjaldaranum, so nyttar lítið at brúka forstørrilsisglas at leita eftir pengum hjá skattagjaldaranum, so nýtti man bæði brøytir og annað slíkt fyri at endavent skattgjaldaranum fyri at rænt hann fyri tær fáu krónurnar, sum man einaferð fær, tá ið øll hini hava fingið sítt.

Tí taka við tær ætlanir sum hava verið frammi her, um flogvøll á Glyvursnesi, ein av teimum framstandandi tosar um at bora undir Leirvíksfirði, úr Klaksvík og uppaftur yvir hjá Tordi Niclasen í Runavík, ein annar tosar um eini 2-3 berghol aftrat teimum, sum eru norði í Árnafirði, tað hava vit havt fyri í dag, tann triði tosar um at gera berghol millum Fuglafjørð og okkurt annað og tað skuldi verða beinavegin, og um ikki landið gjørdi tað, so skuldi kommunan gera tað. Fleiri 1000 mió.kr., um tað ikki hevði rænt tann føroyska skattgjaldaran so ruddiliga, at hann langt síðan í verðini hevði verið

skallutur, so sigi eg einki.

Hetta sum vit hava fingist við aftur ímóti, eru smáttarið samanborið við tað almenna virksemið, sum Fólkaflokkurin hevur skotið upp. Ikki minst tá ið man hugsar um, at so er ein partur av teimum menn, sum hava brúk fyri at fáa fólk til tað, sum Óli Breckmann rópti hesar reiðarakaptalistarnar, eg veit ikki hvat tað er, tað er okkurt nýtt, sum Fólkaflokkurin hevur uppfunnið nú. Hann rópar sínar egnu fyri reiðarakaptalistar, men skip aftan á skip liggja og mangla fólk og teir bumba uppskot inn her um at bora ovarliga og borða niðaliga, tað mest vitleysa, sum nakar hvítur maður kundi droymt um at komið við, og so tosar man um, at ræna skattgjaldaran. Tað er heilt víst, at um nakar hevði rænt skattgjaldaran hesi síðstu árini, so hevði tað verið Fólkaflokkurin í ólukkumát enn tað, sum vit hava klarað higartil. Hetta tosið er so langt út, sum Óli Breckmann er úti í nú, tað egnar seg væl til eitt fríggjakvøld ella eitt vikiskifti, tað haldi eg, tað hevði egnað seg væl til. Takk fyri.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg má siga, at man skal sjálvandi ikki vænta takksemi í politikki, tað er eitt mistak at gera tað, tí politikkur er eitt ótakksamt arbeiði, tað er púra vist, nógvar ringar løtur, harra formaður, tað er púra rætt, í so náta hevði síðsti æraði talari rætt. Eg gangi heldur ikki runt og vænti kompliment frá Henrik Old, men eg má siga eitt um síðsta æraða talara, at eg havi sum oftast veruliga sitið upp aftur á og notið hansara innlegg her í løgtinginum, tað skal síðsti æraði talari hava, at hann er ein óalmindiliga gelindin framførari her á pallinum, humoristiskur og stuttligur, og tí taki eg eisini hasar síðstu glósurnar um okkara dýru uppskot í tí anda tey vóru søgd. Hann var kanska eitt sindur skemtingarsamur og kanska gjørdi nakað nógv av, hvat ið kostnaðinum av okkara uppskotum viðvíkti. Tey hava verið

smá og fá og í hesum førinum miðar hetta uppskot, sum tey flestu í hesum bunkanum, í móti at minka tær almennu útreiðslurnar harra formaður, ið hvussu so er minka tær almennu inntøkurnar.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formaður.

Eg gevi Óla Breckmann rætt í tí, at tað politiska arbeiðið ikki altíð er so takksamt, men eg fari her at nýta høvi til at takka Óla Breckmann fyri hetta uppskotið, sum fyriliggur her í kvøld ella í nátt, og tað, sum gongur aftur í hesum uppskoti, er nakað, sum búskaparfrøðingar hava víst á og eg minnist rætt, tá eg sigi, at ráðgevarar eisini hjá hesum landsstýri hava víst á, ið hvønn litlan mun føroyingar eru førir fyri at kappast orsakað tað høga lønarlagið her á landi. So eg haldi ikki, at vit eiga, at falla í ta grøv, sum undanfarni røðari Henrik Old fall í. Hetta er bara eitt uppskot frá Fólkaflokkinum, eg haldi, at vit eiga at taka tað uppskotið í tí seriøsiteti, sum tað vónandi er lagt fram í. Tí at tað hevur til endamáls at økja um kappingarføri hjá føroyingum og tað í sær sjálvum, harra formaður, er eitt ediligt endamál. Hetta kann gerast m.a. upp á henda hátt, at lønarvøksturin verður steðgaður við at lætta skattatrýstið tilsvarandi, og at landsstýrið tekur upp samráðingar við arbeiðsmarknaðin um henda spurningin. Tað kann ikki annað metast enn at verða skilagott, hvat so úrslitið verður, tað mugu so partarnir finna út av. Tí eitt er neyðugt harra formaður. At tað er neyðugt við afturhaldni, tað er neyðugt við sparitiltøkum, men tað er ikki nokk, tað er neyðugt, at framleiðslan økist í so stóran mun gjørligt, og at rammurnar fyri einki øktari framleiðslu kunnu verða skaptar, og tað meini eg, at tær kunnu verða við fyriliggjandi uppskoti, sum eg taki undir við harra formaður.

Adolf Hansen (fr.) viðmerking

Harra formaður.

Nú er tað soleiðis, at mín atkvøða er líka sterk, sum ein sjeyndapartur av Fólkaflokkinum. Eg komi ið hvussu so er ikki at atkvøða fyri hesum her.

Her stendur við formansins loyvi. Løgtingið álegg-ur landsstýrinum at broyta skattalóggávuna soleiðis, at persónsfrádrátturin verður hækkaður við 1000 kr. undir teirri treyt, at skattgjaldarin nýtir henda pening til vælgerandi endamál.

Tað verður eitt stórt arbeiði í hesum her. Eg haldi, at tað hevði verið betur, so kanska eg kundi tikið undir við tí, um tað kom eitt uppskot um, at man tók 1000 kr. fyri hvønn skattgjaldaran, og rindaði tað til vælgerandi endamál á fíggjarlógini, tað vil siga einar 25 mió. kr. um árið til vælgerandi endamál. Eg haldi, at eg kundi heldur tikið undir við tí enn hesum, tí hetta kemur at kosta bæði 25 og 30 og kanska 50 mió.kr. í arbeiðsløn at sita og umsita alt hetta. Her skal man kontrollera, hvør ið nú brúkar hetta til vælgerandi endamál og hvør ikki brúkar tað. Her stendur við formansins loyvi í seinasta pettinum av viðmerkingunum. Rátt-ligt er tó at landsstýrið skrásetur feløg, ið kunnu verða viðurkend eftir komandi lóg, og at líkningarvaldið fær prógv fyri, at frádrigni peningurin veruliga er farin til endamálið.

Eg má siga tað, at Óli Breckmann hevur betur álit á landsstýrinum enn, hvat eg havi. Eg hevði ikki havt tað álit á teimum, at teir skuldu sitið har, og avgjørt, hvørji feløg nú skulu fáa loyvi. Longur enn til tingið vil eg ikki fara, tí her sita tað hóast alt umboð fyri allar flokkarnar, men fara vit í landsstýrið, at teir skulu til at avgera tað, eg haldi, at tá er man farin ov langt. Eg haldi, at tá fer man at nærkast, orsakað at eg sigi tað, tað fer at nærkast anarki, um vit skulu fylgja hesum uppskotinum hjá Óla Breckmann.

Sverre Midjord (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Eg fari at taka undir við Adolf Hansen í hasum har uppskotinum, um hann skal hava loyvi at trekkja lima-

gjald frá skattinum. tað er asosialt uppskot. Tað er eitt uppskot, sum verður brúkt í Danmark, sum eg segði í áðni, at fólkatingslimurín er við at draga donsk uppskot inn her. Har stendur ofta, um man skal geva nakrar pengar til eitt endamál, at tú hevur rætt til at draga tað frá skattinum. Um formálið við at geva til eitt ella annað endamál bara skal verða at trekkja frá skattinum, so er tað asosialt eftir mínum tykki.

Hitt uppskotið viðvíkjandi lønarviðurskiftum og skattatrýstinum skal eg verða við til at viðgera við vælvild, tí tó so, at tey lágløntu skulu hava kompensatión yvir skatt og toll, men so mugu eisini investeringarnar, sum hava verið frammi her bæði um tunnlar og hvørt av sínum, bremsast. Óli Breckmann var eisini við at gera gjøldur burtur úr sínum egnu uppskotum, at tað var bara sett fram sum ein ólavsøkukabarett, tí tað hevur bara verið sum ein ólavsøkukabarett higartil.

Heini O. Heinesen (tf.)

Harra formaður.

Nú síggi eg, at uppskotsstillarin situr og flennur har niðri, so eg trúgvi ikki, at hann meinar nakað við hesi uppskotini. Eg vildi bara spurt hann, hvar hann ætlar at lækka skattatrýstið? Er tað tær hægru inntøkurnar, ella er tað í tí lægra endanum? Tað kundi verið nokk so áhugavert at fingið hann at sagt tingmonnum frá tí.

So kemur Tordur upp og takkar honum fyri hetta geniala uppskotið, sum stavnamaður fólkafloksins er komin við um at lækka skattatrýstið. Nú má eg siga tað, at Tordur hevur havt ein landsstýrismann sitandi úti í Tinganesi, og eg trúgvi ikki, at tað hevur verið nakað bílig umsiting, tað haldi eg ikki, og hann vil líka sum taka sær rós fyri allar hesar nýggju útreiðslurnar, sum eru komnar. Tað skal einki ilt orð frá mínari síðu verða sagt um tær, men eitt veit eg heilt givið, at skal tað halda fram, trúgvi eg ikki, at tað verður nøkur av hesum sosialu lógunum. Nú er tað eitt ljótt orð hjá Fólkaflokkinum og eisini Kristiliga, hetta sosiala, hetta er

nakað ljótt í teirra verð. Teir kalla okkum fyri tjóðveldissosialistar og annað, tað er eitt ljótt orð. Eitt er heilt givið, at teir eru sera sosialir, tá ið tað er til at fanga stemmir, tá eru teir næstan fremri enn tjóðveldissosialistarnir í so máta, tá tað er teirra egna. Eg trúgvi næstan tí, at um hasar lógirnar skulu halda fram at virka, sum tær eru samtyktar, so kann man ikki lækka skattatrýstið harra Tordur Niclasen.

Tordur Niclasen (kfff.) stutt viðmerking

Harra formaður.

Tað sum eg vísti til í hesum uppskoti, var endamálið, og at endamálið var, at framleiðslukappingin her á landi kundi økjast, og tað er neyðugt. Tað er gott við atturhaldni og sparipolitikki, men tað er sanniliga eisini neyðugt at økja framleiðsluna, og tað var tað, sum eg vísti til, at hetta ella eitt líknandi uppskot kundi verið medvirkandi til økta framleiðslu, og tað er ikki nakað, sum Óli Breckmann hevur funnið upp á ella eg, hetta er nakað, sum okkara egnu búskaparfrøðingar vísa á, at vit hava ikki eitt livandi kjans í kappingini við tí lønarlagi, sum er.

Eg haldi, at tað er eitt sindur við síðuna av, harra formaður, eg haldi, at tað er einanstandandi, at Heini O. Heinesen skal koma upp higar og loyva sær at spyrja, hvar skattatrýstið skal lækka, um tað skal verða láginntøkur ella háinntøkur. Í 4 ár hevur Heini verið sitandi í samgongu, víst á hetta og serliga, tá mikrofonin hevur verið opin, at skattatrýstið á láginntøkurnar má lækka. Nú er so møguleikin fyri tí. Sjálvandi er tað har, tað er fyrst og fremst tað, sum er neyðugt. Henda spurningin nevur nønn reist ferð aftan ferð og gjørt seg til talsmann fyri, je, felagsnevnara fyri, at trýstið fór at lækka. Málið er eitt skilagott mál, og tað kemur at økja um framleiðslumøguleikarnar, og tað er bara gott fyri eitt land, og so er tað líka mikið, um tað er Óli Breckmann, Fólkaflokkurin ella, Heini O. Heinesen ella hvør ið leggur tað fram.

Óli Breckmann (tf.) stutt viðmerking

Harra formaður.

Tað var ein beinleiðis spurningur. Sjálvandi skal og má tann lægri inntøkuendin fáa tær bestu søndirnar tað sigur seg sjálvt, og tað kann gerast á tveir mátar, man kann hækka skattalágmarkið og har við sleppa teimum, sum er ringast fyri, frægast uncan, men tað er sjálvandi tann stóran miðan, tað er fjøldin, sum ber tann stóra skattin, og tað er frá miðjuni og kanska niðureftir, at vit serliga skulu hugsa um at lækka skattatrýstið, tað sigur seg sjálvt.

Um hitt málið, sum harn nart við, trúgvi eg, at hann hevur misfatað okkurt, tí tað er ein himmalvíður munur, at verða sosialur og at verður sosialistur. At verða sosialur merkir at hava samfelagsmet, umsorgan og hava eitt forstáðilsi fyri teimum, sum kanska hava mest tørv á tí, teimum minnu mentu, meðan tað at vera sosialistiskur, antin man er javnaðarsosialist ella tjóðveldissosialist ella kremlsosialist ella burmasosialist, nú er tað ikki so "populært" at vera burmasosialist í løtini, ella nationalur sosialistur, tað kann man eisini verða. So liggur í tí at vera sosialist at man vil fegin hava ein centralstýring, man vil fegin hava ræði á øllum lutum í samfelagnum út frá miðjuni, so tað er ógvuliga stórur munur at verða sosialur, tað vilja vit nokk øll fegin verða, meðan tað illavorðna orðið, harra formaður, tað er at verða sosialist antin man er tjóðveldissosialist ella nakar annar sosialistur.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Nú tosar Óli Breckmann um umsorgan. Tann, sum skal hava umsorgan, tað er sjálvandi samfelagið, og tað er samfelagið, sum leggur skattin á, og her er tað "tæring efter næring". Tað er tað, sum tað snýr seg um, so tað er bara at koma upp her og fortelja, hvørjar av hesum her útreiðslunum skulu skerast burtur, tá man hevur lækkað skattatrýstið, tað er tað, sum tað snýr seg, tað

snýr seg ikki um nakað annað, tað kundi Tordur Niclasen komið upp her og fortalt okkum okkum nýtist ikki at verða ósamdir, tað er bara at siga okkum, hvørjar útreiðslur skulu skerast burtur, tað er tað, tað snýr seg um, vit kunnu allir verða samdir um at lækka skattatrýstið.

Men tá tit hava staðið her uppi og atkvøtt fyri útreiðslum oman á útreiðslum, so skulu tær sosialistisku útreiðslurnar ella borgaligu útreiðslurnar skulu gjaldast av samfelagnum, óansæð, veðhald og alt hetta ymiska. Alt hetta her skal gjaldast, tað skal man siga fólki, tá man tosar um at lækka skattatrýstið, tað er veruleikin í tí heila, hatta skilja allir borgarar.

Tordur Niclasen (kff) stutta viðmerking.

Harra formaður

Tað er nokk soleiðis at, at ein meginregla er tann, at verður framleiðslan økt í einum landi, so kemur tað eisini at geva meiri í kassan hjá tí landinum, tað er ein meginregla, og tað haldi eg eisini er umhugsað í hesum uppskoti.

Óli Breckmann (ff) eina síðstu viðmerking.

Harra formaður

Eg skal leggja afturat tí, sum síðsti ærari talaði segði, at 2/3 av løgtingsfíggjarlógini harra formaður eru lønarútreiðslur, tað er beinleiðis tilskot til inntøku hjá fólki, tað er heil løn til kanska túsundavís av føroyingum, um skattatrýstið lætnar soleiðis, at umkostningarnar av at liva og at reka samfelagið, vinnulívið lætna, so verður tað eisini bíligari hjá landskassanum at røkja sínar skyldur, tað vil siga at landskassin sleppur við lægri útreiðslum, og tað vil siga, at man harvið vinnur tann skattalættan aftur, sum man annars gevur fólki. Tað hevur ongantíð verið nakað problem hjá Heina O. Heinesen og hansar samgongu harra formaður at finna offur, tá man skuldi herðað skattatrýstið í hesum samfelagnum, men nú knappliga koma teir til okkara og

biðja okkum útpeika tey fólkini, sum skulu fáa skattalætta. Eg fari at svara aftur við at siga, um tit bara geva teimum fólkunum tað aftur, sum tit hava tikið frá teimum, so eru vit nøgd.

Sverri Midjord (jv) heilt stutt.

Harra formaður

Vit vóru við til at leggja ein oljutoll á, og teir fyrstu sum vóru við til at krevja part í oljutollinum, tað var júst Fólkaflokkurin aftaná, at vit vóru hølvaðir í gjøgnum aftan á oljutollin.

Tað er rætt, at um tað skulu broytingar fara fram í skattinum og í lønarlagnum, so mugu eisini tey óproduktivu tiltøkini, sum Fólkaflokkurin setti fram her í dag, um berghol bæði her og der, mugu steðga, má øll hesi arbeiðini útsetast, sum Fólkaflokkurin hevur verið talsmaður fyri her tað seinastu tíðina muguutsetast.

Formaður

Orðaskiftið er liðugt í hesum báðum málunum, tað er uppskot um at beina uppskotini í skattanevndina og verður gjørt. Tingmál nr. 27 og tingmál nr. 28 verða beind til viðgerðar í skattanevndini.

Tað eru 8 mál eftir her, sum eg meti, at øll fara í skattanevndina, um tingmenn ikki hava nakað í móti tí, so verða øll tikin til viðgerðar undir einum, um eingin hevur nakað í móti tí

Óli Breckmann (ff)

Harra formaður

Tað er kanska rætt, at summi mál kunnu verða kroyst í somu nevnd, men eg haldi vit skulu royna at halda tvey mál uttanfyri, og tað eru tennisar og trúboðarnar, eg haldi vit skulu hava tey bæði frá hvørjum øðrum, um eg kann fáa tað, tak fyri.

Formaðurin:

So kemur til viðgerðar:

Tingmál nr. 31: Skattalætti fyri inntøkur av útleiging.

Tingmál nr. 32: Skattafrádráttur fyri leigiútreiðslur til býli.

Tingmál nr. 30: Avtøka av avgjaldi av blýfríum bensini.

Tingmál nr. 33: Uppskot til samtyktar um hálvt Útvarps- og sjónvarpgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving.

Tingmál nr. 43: Broyting í Útvarpslógini.

Tingmál nr. 46: Avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll.

Tingmál nr. 38: Sjálvboðin uppsparing við skattafrádrátti.

Tingmál nr. 40: Skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna trúboðarum.

Hesi málini koma so til viðgerðar undir einum.

Óli Breckmann (tf)

Harra formaður

Vit hava tvey uppskot her, sum snúgva seg um leigu, annað tekur hensyn til leigaran serliga, har hann er høvuðsmálið og hitt tekur hensyn til tann sum leigar út.

Harra formaður, bæði uppskotinum, sum sjálvsagt er, tá ið tað er Fólkaflokkurin, sum leggur tey fram hava eitt sosialt sikti. Eg skal stutt siga, hvat ið uppskotið um útleiging snýr seg um. Her verður roynt at bøta um bústaðarviðurskiftini hjá teimum, sum eina tíð av lívinum ella kanska alt lívið búgva inni hjá øðrum fólkum og leiga sær bústað. Tað er orðað soleiðis, at tað skal verða møguligt hjá fólki, sum hava avlopsplass heima í sínum egnu húsum, at leiga ein part av húsinum út, tann ónýtta partin, og eg skjóti upp her bara, at vit gera á tann hátt, at leiguinntøka upp til 40.000 kr. árliga, verður skattað serskilt soleiðis, at hon ikki

So nú kemur oman á A-inntøkuna og tí fyri tað mesta fer avstað aftur í skatti, tí gerst jú ólønsamt hjá fólki at leiga út.

Nú høvdu fólk sum eiga avlopspláss serliga í teimum stóru plássunum, fingið hesa tilskundan til at leiga pláss út, ein beinleiðis inntøkufyrimun av tí. Um tey ikki vórðu revsað fyri tað, so hevði tað ivaleyst ført við sær, at fleiri fólk vildu leiga út, tað hevði gjørt fyri teirra viðkomandi, at fleiri høvdu fingið møguleika at fíggja rentur og avdrag av sínum egnu sethúsum við inntøku, sum stavaði frá leigu. Nú er tað serliga ung fólk, ung hjún við børnum, sum sita við nýggjum húsum, og sum tí sita við tungum húsum. Tað vil siga, at tað kanska hevði verið møguligt hjá teimum fólkum at kunna býtt seg sundur soleiðis, at annað av hjúnafeløgunum varð verandi heima og passaði børn tey árini, sum hetta her krevjandi arbeiðið stendur uppá, tað er jú avmarkað, samstundi sum tey høvdu haft meiri inntøku til at fíggja síni egnu sethús við.

Tá ið fleiri íbúðir og kømur vórðu tøk á marknaðinum, so hevði sjálvandi leigan av tí at útboðið øktist, sum tað varð sagt her í áðni, tá ið Heini O. Heinesen hugleiddi um eitt sindur av nationaløkonomi, so hevði tað sama gjørt seg galdandi her, nevniliga at útboðið og eftirspurningurin høvdu eina positiva ávirkan á prísin. Tað hevði verið lættari hjá fólki at kunna líva til leigu, og tey høvdu skjótari kunna spart sær pengar saman til síni egnu hús. Hesi fólkini høvdu skjótari í lívinum fingið samlað sær saman pengar til síni egnu hús, og so kundu tey byrja um aftur at leiga út frá sær soleiðis, at niggj ættarlið høvdu fingið tak yvir høvdið upp aftur skjótari. Tað vil siga harra formaður, at og hesi uppskotini faktisk hoyra so mikið nógv saman, at fari faktisk at enda tey her við bara at taka saman um uppskot nr. 32 og siga at, tað skal verða ein fyrimunur hjá ungum fólkum at eiga ella miða ímóti at eiga síni egnu hús, tí vit mugu siggja í eyguni tað landsvirðið, sum liggur í tí, at tey flestu búgva ínni hjá sær sjálvum. Kortini mugu vit ikki síggja burtur frá, at leigufrádrátturin hjá hesum fólkum, frádrátturin í skattinum

fyri at búgva til leigu, má hækka, tí at tað er øgiliga trupult hjá ungum fólkum at koma út úr einari leigustøðu. Tað er ein óndur cirkul, og um tey ikki fáa eina hjálp um skattin so verður kanska frameftir ómøguligt hjá nógvum.

Hatta var so hasi bæði uppskotini, tey, haldi eg, hoyra natúrliga saman harra formaður. Eg skjóti upp, at tey fara eisini í skattanevndina.

So koma vit til eitt uppskot, tað var so blýfrítt bensin harra formaður, sum so kom,. Hatta er eitt sindur tekniskt uppskot, eg veit at Bilhandlarafelagið hevur gjørt vart við ta, gongd, sum er í bilframleiðslu á bilmarknaðinum, nevniliga at fleiri og fleiri bilar fara frá hesum dálkandi bensininum, sum vit hava brúkt í nógv nógv ár yvir til eitt sokallað blýfrítt bensin. Men av tí at oljufeløgini ikki hava nakrar goymslumøguleikar, teir hava ikki serskiltar pumpur ella bilar ella hvør onnur útgerð skal til fyri at goyma og selja hetta bensinið, so hevur tað ikki verið nakað serligt at fingið av tí. Men tað er alt, sum bendir á serliga nú, vit hava eitt landsstýri, sum roynir eftir førimuni, tað er ikki altið so lætt hjá teimum staklarnir, tí man má jú ikki krevja meiri enn eitt vist, sum kortini roynir at verja umhvørvið. So eg haldi, vit eiga at ganga hesum landsstýrinum á møti, og tí veit eg eisini, at hetta uppskotið fær eina veldúga undirtøku frá samgonguni, nevniliga at gera tað lagaligari at eggja fólki til at keypa bilar, sum koyra við blýfríum bensini. So hatta er eitt uppskot, sum sjálvandi fær undirtøku eisini.

Harra formaður kann eg so fáa at vita næsta nr?

Formaðurin

Tað stendur eisini frítt fyri at viðgera.

Óli Breckmann (ff.)

Tað má eisini í skattanevndina, ja, so kann eg sjálvur avgera, mær manglar tvey uppskot.

Lat meg so taka tingmál nr. 38 við formansins loyvi, tað er sjálvboðin skattauppsparing við skattafrádrátti.

Hetta uppskotið hevur merkverdigvís ikki fingið undirtøku. Tað hevur verið fyri í løgtinginum tvær ferðir, hetta er eitt strálandi uppskot, sum øll hini, vit hava lagt fram her í kvøld, og tað, sum tað snýr seg um, tað er at útvega einum og hvørjum borgara í samfelagnum valið í millum antin at gjalda 10.000 kr. í skatt um árið ella eisini seta tað inn á sína egnu sparibók. Eg skal ikki spyrja nakran av tingmonnunum um teirra egnu meining um hetta hugskotið, og hvat teir høvdu gjørt, um teir høvdu havt møguleika harra formaður. Eg havi eina absolutta fatan av, hvat ið svarið hevði verið í hvørjum einasta føri, antin man spurdi Poul J. Olsen ella Hilmar Kass, kanska tað besta dømi ella eisini Flemming Mikkelsen ella hvønn, tað skuldi verið, hvat vil man heldur 10.000 kr. á sparibók við skattafrádrátti ella at borið hesar somu 10.000 kr. út til Jóngerð Purkhús at forvalta fyri seg.

So eru ávísar treytir harrí formaður, sum man setir við, t.d. at man skal brúka eina sovorðna uppsparing, sum er frádráttarberattig, til ávís endamál sethús, virkir, útbúgving ella eisini ein onnur treyt, tað er nevniliga at lata upphæddina standa í eitt ávíst áramál. Um vit høvdu fingið hetta uppskotið samtykt, tað eri vísur í at vit fáa, so høvdu vit skapt eina størri investeringsupphædd tøka í føroysku peningastovnum upp á kanska 100 mió. kr. um árið, og tað hevði føroyskt vinnuliv sjálvandi verið taksamt fyri at fingið disponibult. Eg haldi ikki, tað er stórt meira at siga um hatta har. Hatta hevði sjálvandi serliga hjálp ungum fólki, sum skulu starta í lívinum. So mikið gamlir eru vit kortini ikki verðnir her í tinginum, at vit ikki minnast, hvussu tað føldis, tá man skuldi starta, ikki satt Poul J. Olsen.

So var tað uppskot, harra formaður, nr. 46: avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging við skattafrádrátti fyri øll.

Harra formaður er tað nakað, sum bedrøvar meg í kvøld, so er tað, at vit ikki hava meiri tíð, og vit ikki hava størri manning í løgtinginum til at viðgera hetta uppskotið við tí álvara sum tað hevur uppiborið,

tí eg skal garantera løgtinginum fyri í gjøgnum formannin sjálvandi, at einki uppskot í hesi fýra árini harra formaður hevði havt størri týdning fyri útsjóndina av tí nøroyska samfelagnum enn nettup hettar her. Nú hugsi eg frá einum reint menniskjaligum sjónamiði, frá einum sosialum sjónarmiðið, tí eg trúgvi, at hitt uppskotið, sum vit høvdu áðrenn, hevði frá einum búskaparligum sjónarmiði, hetta við lønar- og umkostningsniveaunum hevði havt ein størri týdning. Men hugsi tykkum, at tað varð álagt hvørjum einstøkum menniskja, sum var í vinnu, og sum hevur ábyrgd av eini familju, tað vil siga, tað hevði rokkið hvørt eitt einasta eitt individ, hvørt húsarhald í landinum, at skula tryggja seg, og tað er also við einari egnari ábygd, men eisini við einum valfrælsi soleiðis, at tað var ein lívstrygging, sum var umfatað, av eini avlamingstrygging og eini eftirlønartrygging eftir tørvi, eftir ynski. Tað almenna í hesum uppskotinum stuðlar hesum valfrælsi við at siga, ja men líka mikið hvønn møguleika tygum sum tryggingartakari, sum borgari í samfelagnum velja, so verður tann avgerðin stuðlað, samsýnd yvir skattin. Tygum fáa hesa trygging-arupphædd eftirgivna sum skattafrádrátt, tey høvdu týtt uppsparing kanska uppá 150 mió. kr. um árið. Hon hevði byrjað nú ella ta løtuna uppskotið hevði verið samtykt, harra formaður.

Formaðurin

Viðmælisrómur er ikki loyvdur í tinginum og heldur ikki mótmælisrómur, so sum at standa og klappa, tað er ikki vanligur tingsiður.

Óli Breckmann (tf)

Orsakað eg gjørdist kanska nakað eldhugaður fyri mínum egna uppskoti, harra formaður, tað er kanska eitt tekin um, at klokkan er við at fara frá okkum harra formaður. Tað er spell, men sum sagt tað er gjørt í góðari meining, tí at tað er avmarkað hvussu indosiastiskur Adolf Hansen kann bliva.

Men líka mikið harra formaður, hetta var ið hvussu so er eitt góður tanki, haldi eg sjálvur, og vit mugu vita at hendan skipanin hevur ávísar fyrimunir, alsó heilt upplagdar fyrimunir, teir eru eisini nevndir í viðmerkingunum, hon hevur veldugar fyrimunir fram um ta sokallaðu samhaldsføstuarbeiðsmarknaðar eftirlønarskipanina, hon er tíverri líka so tung sum tað orðið, ið Fróskaparsetrið í ólukkumát hevur valt at geva tí tryggingarskipanini, eg eri bangin fyri, at tað verður kanska gravarmæli yvir tað skipanina.

Læt okkum líka nevna fyrimunirnar við hesari skipanini nevniliga, hetta er ein lívstrygging við stórari útgjalding við deyð í ótíð, ein veldigur fyrimunur fyri tey avvarðandi, hetta er ein avlamistrygging við stórari útgjalding við avlamni, hon verður lagað eftir tørvi. Har eru aðrar tryggingar Poul J. Olsen, sum vit báðir kenna væl, tað kemur í tí næsta uppskotinum, so eg fari at biðja ærað tingtim í gjøgnum formannin sjálvandi at geva tol, til vit koma til deyðu tryggingina, til tryggingina hjá teimum deyðu.

Tann samhaldsfasta um formaðurin vil orsaka meg, at eg stytti navnið niður í bara hettar eina orðið tann samhaldsfasta, hon hevur hvørki lívstrygging ella avlamistrygging, so bara har eru tveir veldugir fyrimunir í hesum her uppskotinum.

Ein annar fyrimunir er, at meðan hin samhaldsfasta økir skattatrýstið við 4%, spreingir skattaloftið, økir umkostningsniveauið í samfelagnum, so sleppur hendan tryggingarskipanin tryggingartakaranum lættari í skatti. Tað verður skotið upp, at vit lætta skattatrýstið við upp til 10.000 kr., eini 5 til 6% av inntøkuni hjá tryggingartakaranum.

Hendan samtryggingin, sum vit hava skotið upp her, virkar skjótari, hon er munabetri eisini, tí hon fær gildi beinavegin, sum tryggingin er teknað, meðan hin samhaldsfasta kemur ikki at virka fyrr enn einaferð inni í tí næstu dekatini - nú er Heini O. Heinesen ikki herdekata merkir annars ár 10, einaferð mitt í 90unum, so tað er sum at venda einum stórhvali í einum baðikari, at skula fara at berjast við tað samhaldsføstu tryggingar-

skipanina harra formaður, hendan er effektiv skjót, hon virkar.

Hendan skipanin hevur tann fyrimun, hon tálmar tað almennu nýtsluna, meðan hin samhaldsfasta, hon økir hesa almennu nýtslu.

Hendan skipanin økir uppsparingina í samfelagnum og gagnar harvið tí einstaka í vinnulívinum og hon ber í sær valfrælsi fyri tryggingartakaran eftir ynski og tørvi scleiðis, sum umstøðurnar broytast, meðan hin samhaldsfasta er tung og virkar tyngjandi eins fyri øll. Hon skal virka solidarisk, men hon virkar soledarisk og nettup eisini í sínum vánaliga spektum, haldi eg. ???

Tá man hugsar um, hvussu nógv feløg, fakfeløg harra formaður, nú veit eg, at fakfeløgini standa hjarta hjá summum tingmonnum nær, vit hava júst havt eitt orðaskifti um fakfeløg her, eg hugsi kanska mest um teir einstøku limirnar í fakfeløgnum, meðan aðrir tinglimir hugsa meiri um hendan maskottin hendan her risan, sum eitur felagið sjálvt sum organitatión. Men tá man hugsar um at t.d. Starvsmannafelagið, Postfelagið, teknikarfelagið, maskinmeistarafelagið, løgfrøðinga-, magistara-, lærara-, sjúkrasystrafelagið og mong onnur yrkisfeløg longu hava teknað eina sokallaða samlagstrygging, meðan túsundtals aðrir einstaklingar høgt sum láløntir tekna sær einsæris tryggingar, tað er jú aftur ein fríheit her. Uppskotið sigur bara, eitt fakfelag hevur skyldu til at tryggja, at hvør einasti limur er dekkaður, annars skal hvør einstakur syrgja fyri sær sjálvum, vit hava jú klassiska dømi nettup við eini samhaldstrygging í Havnar arbeiðsmannafelag, har sum tað nú harra formaður ber til hjá einum arbeiðsmanni í Havn at hyggja trygt inn í eyguni á aldurdóminum, sum høttir beint um næsta húsahorn harra formaður.

Ein arbeiðsmaður í Havn kann fara frá ikki bara við síni fólkapensión og er óskerd, tað eigur hon at verða, tíverri ríkur nokk viðbótin, tað eigur hon ikki at gera, og tað miðar hettar uppskotið eisini ímóti, at hon ikki skal gera, hann fær sína fólkapensión og hann fær sínar 3 til 4000 kr. um mánan. Vit skylja væl tað, at summir vinstrahallir her í tinginum hava verið skept-

iskir, at man knappliga upplivur eina arbeiðarafjøld, sum ikki nýtist at sita við hondunum vendum upp og eygunum verdum til Himmals, starandi út í Tinganes, bønandi og biðjandi um molarnar, sum detta av ti almenna ríkmansborðinum harra formaður. Bara tann kollvcltingin, sum liggur í tí, at arbeiðsmaðurin í Havn er tryggaður, hann hevur tryggja seg sjálvan, hann hevur tryggja seg solidariskt ígjøgnum sítt fakfelag. Eg má siga eitt, tá vit nú eru við tað harra formaður, hvussu trist tað má verða hjá øðrum fakfeløgunum, sum høvdu sett sínar vónir til Tinganes um, at Tinganes skuldi loysa teirra tryggingar ella teirra eftirlønartrupullcikar. Eg hugsi t.d. her um nógv feløg innan fyri Føroya arbeiðarafelag, kanska tað mest eklatanta dømið er Havnar handverkarafelag, har formaðurin kom út sum eitt óløgi og vrakari, fordømdi tað samhaldsføstu skipanina, sum landsstýrið langt um leingi kom við, tí hon munar ikki, hon sker niður, hon javnar jú víst javnar, hon harri formaður, hon javnar bara tann eina vegin nevniliga niðureftir. Tí skulu vit nú í næstu framtíð uppliva, hvussu Havnar handverkarafelag fær tekna eina samhaldstrygging Havnar arbeiðsmannafelag, sum mótmæli í móti tí elendigu skipan, sum Tinganes kom við, so harra formaður eitt trúgvi eg, vit kunnu roxna við at síggja meir til aftaná, at hendan tingsetan er liðug, tað hopi eg, ið hvussu so er, tað uppskot, sum hetta her harra formaður.

So skal eg fara yvir til skattafrítøkuna av kirkjum og sankomum til at samsýna trúboðarum. Eg haldi sjálvur, tað er nr. 40, og eg skal takka formanninum einaferð afturat, tað var hinum formanninum, at hann vildi trekkja markið her og lata hetta uppskotið ganga frítt av tí næsta, sum vit taka til viðgerðar aftan á aftur, men eg haldi, tað eru tvey uppskot afturat, men tað kunnu vit so venda aftur til.

Her stendur, at fólkakirkjan, missiónin og trúarsamkomur okkara røkja umframt eitt kristniboðaraarbeiði eisini eina umfatandi samfelagsliga tænastu, sum aldrin kann gerast upp á kr. og oyrum. Eitt fjølment lið av føroyingum, sum eftir at hava givið keisaranum, tað meinast sjálvandi við tað almenna, tað í keisarans er,

tað vil siga, tað Jóngerð Purkhús tilkemur, harumframt letur ein dyggan stuðul til kirkjur og samkomur sínar, tað mugu vit taka hattin av fyri. Her eru fólk, sum bæði røkja sínar skyldur í móti samfelagnum og eisini gera eitt ógvuliga stórt sjálvsøkið arbeiði, sum kostar pengar, og ein týðandi partur av trúararbeiðinum er kristniboðanin, tað vita vit, hon verður røkt av okkara egnu og eisiri av vitjandi útlendskum trúboðarunum, sum sjálvandi skulu liva júst, sum øll onnur og mugu hava eina inntøku at liva av.

So koma vit til poengið í málinum, at galdandi skattalóg áleggur trúboðarunum eina skattskyldu, hóast teirra ofta lítla inntøka er samsýning, tí teir fáa jú ikki eina løn, men eina samsýning í form av einari gávu, sum eitt fáment kirkjulið, antin tað er fólkakirkjan í Kunov ella, tað er ein hvítusunnusamkoma í Havn ella, hvat tað skal verða, ella Frelsunnarherurin savnar saman sínámillum til at samsýna hesum vitjandi trúboðarunum. Allir tingmenn skylja, hvussu natúrligt tað skuldi verið at sloppið samkomunum undan av skattligum áðum at savna saman dupult so nógv inn at samsýna trúboðarum sínum og vitjandi, sum neyðugt er, fyri at samsýningin skal muna til lívsins uppihald og til ferðing til og úr Føroyum. Eg haldi sjálvur, tað er týdningarmikið at bara okkara egnu trúboðarar kunnu virka burturav sum trúboðarar, tí nógvir av teimum vilja tað fegin, samkomurnar hjá teimum vilja tað fegin, men ráðini eru ikki til tað, men eisini tað, at vit fáa útlendskar trúboðarar til Føroyar soleiðis, at trúarlívið verður meira fjølbroytt, inspirationir koma uttannífrá, sum altíð er gott, oftast er gott.

Okkara kirkju- og samkomulív verður andliga ríkari og røkkur harvið longur í kristniboðanini og sosiala virkseminum, um kirkjuliðið, missiónin og fríu samkomurnar høvdu sloppið undan skattskyldu av trúboðarasamsýning soleiðis, at tær gávur, sum verða innsavnaðar, høvdu rokkið dupult so langt, ein tær gera eftir galdandi skattalóg.

Eg fari at biðja skattanevndina, tað verður væl hon eisini, sum fær hetta uppskotið, um at taka nakrar

samkomuleiðarar inn á fund og vita, um ikki ein tørvur er á nettup einum sovorðnum uppskoti, tí eg veit, eg trúgvi, Adolf Hansen situr har og veit tað eisini kanska, og Tordur og Poul Jacob Olsen, nú veit eg ikki, hvør er mest aktivur av hesum monnum, tað hevði verið ið hvussu so er hesum málinum til fyrimuns, harra formaður. Takk fyri.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður.

Fyri at taka tað síðsta uppskotið fyrst, so vil eg siga her beinanvegin, at hetta er eitt uppskot, sum áður hevur verið frammi her í tinginum, og minnist meg rætt, so varð tað afturtikið, tí at tað tyktist, sum at málið fór at falla, og viðkomandi tingmaður tók tað aftur, fyri at tað ikki skuldi falla her á tingi. Men harra formaður, eg loyvi mær her og nú at siga, at eg taki undir við hesum uppskoti.

Í samband við uppskot nr. 31 og 32 eisini, loyvi eg mær at koma við hesum viðmerkingum. Tað er fyrst og fremst uppskot nr. 31: Skattalætta fyri inntøku av útleiging.

Hetta er eitt uppskot, sum eisini hevur verið frammi her í orðaskifti áður á tingi, eg haldi tað var í 1981, eg var inni sum varamaður tá fyri tann táverandi Framburðs- og fiskivinnuflokkin, at eg sjálvur legði eitt uppskot fram á ting, um at bøta um íbúðatørvin, sum í stórt mát gjørdi seg galdandi serliga her í høvuðsstaðarumráðnum. Minnist meg rætt, so gekk tað uppskotið út upp á, at inntøka hjá teimum, ið leiga út, varð skattað við helvtarbýti. Tað er júst tað, sum uppskotsstillarin her stórt sæð hevur tikið tráðin upp eftir tí uppskoti, sum tá fyrilá.

Støðan viðvíkjandi tørvinum á íbúðum, harra formaður, er ikki batnað síðani 1981 tvørturímóti.

Eg minnist, hvørja løgnu, tað málið fekk tá, at tað fall, og undir orðaskiftinum. Uppskotsstillarin kann kanska rætta meg, um eg sigi nakað skeivt, her gjørdu

serliga javnaðarmenn vart við, at tað vóru spekulantarnir, sum nú aftur fóru at fáa meiri vinning burtur úr íbúðarneyðini, sum teir málbóru seg tá. Sjálvandi var tað ein greið støða at hava, og út frá tí sjónarmiðnum skilji eg væl, at teir ikki atkvøddu fyri tí. Aðrar loysnir vórðu skotnar upp, og einki er at ivast í, at ábøtur eru gjørdar kanska serliga her í Havnini fyri at bøta um íbúðartrupulleikarnar, men harra formaður, eg vil endurtaka, var støðan vánalig tá hjá ungfólki at fáa tak yvir høvdið, har tey yngstu leiga, so er hon tað nógv verri í dag.

Tí er hetta uppskotið, sum fyriliggur, kærkomið. Tað er ikki longur síðani enn í dag undir viðgerðini av lestrarstuðningi, at eg vísti til hetta sama, tí sakin í dag er tann, at nú er tað sjálvt LFÚ, sum hevur sent, minnist meg rætt, løgtinginum og fjølmiðlunum skriv, har nettup hesin felagsskapur, sum eitur LFÚ, vísir á júst somu loysn, sum eg gjørdi í 1981, og aðrir hava gjørt síðani og nú Óli Breckmann aftur her við hesum uppskoti.

Nú er tað ikki bara teir sokallaðu kapitalistarnir, sum vilja nøra um sín fong, sum koma við slíkum genialum uppskotum sum hesum, nú er tað sjálvur felagsskapurin LFÚ, sum ger tað. Eg rokni við, at teir gera tað, tí at teir harvið vilja undirstrika neyðina, tørvin hjá ungum leysandi at fáa tak yvir høvdið fyri ein rímiligan prís, og tað er einki at ivast í, at tað eru mong, sum ikki leiga út júst av teirri orsøk, at inntøkan verður løgd omaná, og tí verður hon harðari skattað.

Tað eru menn her í salinum, sum leiga út, og kanska teir hava eina betri føling við hesum, enn hvat eg havi sjálvur.

Harra formaður, So er tað hitt uppskotið nr. 32. Tað er rætt, sum har verður sagt viðvíkjandi skattafrádrátti fyri leiguútreiðslur til býli, at tað hevur verið siður her á landi at fáa sær sitt egna og ikki at liva til leigu, men vit mugu ásanna, at tað eru tey, sum í stytri ella longri tíð gera brúk av hesum møguleika. Tað er rætt, tá ið tað verður sagt, at tað er tungt at seta fót undir egið borð.

Vit kenna til grundstykkjaprísirnar eitt nú í Havnini. Fólk, sum hava verið í læru kanska drongur og genta, hjá teimum kann tað verð ein loysn at búgva til leigu, meðan ein ávis uppsparing fer fram til húsabygging. Tá er hetta kærkomið, at kunna fáa ein frádrátt yvir skattin. Hesi eru til deils samanhangandi, so hetta er uppskot, sum Kristiligi fólkaflokkurin í síni fullu stødd fer at taka undir við.

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 30, harra formaður: Avtøka av blífríum bensini, er at siga, at lond rundan um okkum hava gjørt nógv burtur úr hesum, at líka sum at appelera til bilføraran, bilbrúkaran at fara yvir til at brúka blífrítt bensin. Hví? Jú hin afturvendandi trupulleikin dálkingin, dálkingin, sum í ólukkumát ger seg galdandi. Tað var gleðiligt í dag, sjálvt um tað ikki fekk nakra viðgerð, var tað gleðiligt at siggja, at eitt mál um hesar freondósirnar kom til viðgerðar her í løgtinginum frá landsstýrinum. Har var ein av viðmerkingunum henda, at vit kundu leggja nakað til fyri at minka um nýtsluna, sjálvt um okkara nýtsla globalt talað ikki er tann stóra, "mange bække små, gør stor å", sum sagt verður. Tí er eisini, orsaka harra formaður, at eg citeraði hatta á donskun, tit skilja týdningin av tí, og kanska onkur er so beinasamur, at umseta tað. Eg ivist ikki í, at onkur tjóðveldismaður er so beinasamur.

Harra formaður, Dálkingin hóttir, hon hóttir stórbýin í ólukkumát, hon er eisini farin at merkjast um enn ikki í stórt mát so eisini her. Nú mugu vit bara ásanna, at Føroyar hóast alt er ein partur av hesari klótu. Vit eru ikki ein sjálvstøðug klóta uttan fyri ta klótu, sum nú í størri og størri mát verður dálkað. Tí er tað rætt og rímiligt eisini at vit her á landi royna at gera tað, vit kunnu fyri at minimera hesa dálkingina, og tað gera vit millum annað við at gera tað meira lagaligt og høgligari hjá fólki eitt nú at brúka blífrítt bensin til bilar. Tí taki eg fult út undir við hesum uppskoti, at løgtingið áleggur landsstýrinum at avtaka serliga avgjaldið á blífríum bensini. Hetta er eitt gott umhvørvisuppskot, og sjálvandi havi eg einki ímóti, at tað fer í skattanevndina soleiðis, sum uppskotsstillarin setti

tað, tað er kanska nátúrligt, at tað fer hagar, tí at tað er talan um at broyta avgjaldsskipan ella lóg.

So harra formaður, eg komi nokk ikki longur á hesum sinni viðvíkjandi teimum rúgvismiklu uppskotunum, sum eru løgd fram, men hesi, sum eg havi nevnt, vil eg so, tá ið atkvøðugreiðslan kemur, taka fult undir við og vóni, at hesi uppskotini fara at vinna frama. Eg vil ávara tingmenn enn eina ferð at falla í tá grøv at siga, ná ja, tað er bara Fólkaflokkurin. Lat okkum taka málini soleiðis, sum tey liggja, og síggja meira upp á innihaldið enn hvør, ið hevur lagt tað fram, tí tað í sær sjálvum eigur ikki at vera avgerandi fyri málið.

Harra formaður. Eg havi ikki meira á hesum sinni og takki fyri.

Sverre Midjord (jv.)

Harra formaður.

Tað vóru nú fleiri uppskot, sum komu frá háttvirða tingliminum Óla Breckmann, og eitt var so viðgerðin av hesi góðu pensjónsskipan, sum landsstýrið var komið við, og við einum forhánisligum smílí tosaði hann um, hvussu væl, ið fyriskipað var her í Havn, at fakfelag í Havn hevði nú tryggja sínar arbeiðsmenn, og tað er alla æru vert. Men Óli Breckmann tosar sum vanligt, hann tosar um nakað, sum hann ikki veit nakað um. Tí veruleikin er tann, at fakfeløgini úti um landið, tey smáu fakfeløgini, sum eru limir í Føroya arbeiðarafelag, vildu eisini havt møguleikan at tryggja síni arbeiðsfólk, um teimum eins og arbeiðsfólkinum í Havn var tryggjað arbeiði hvønn einasta dag av teimum investeringum, sum tað almenna hevur gjørt her í Havnini.

Úti um landið eru tað fakfeløgini sjálvi, sum mugu seta til, tey eru sín egni arbeiðsgevari, tí tað sokallaða fría fyritakssemið, ja, har er nógvur arvur í millum tað fólkið, sum eg ið hvussu er kenni til runt um í landinum. So fakfeløgini sjálvi eru noydd at seta so nógv prosent av til løn fyri at kunna hava arbeiði, tað veit Óli Breckmann um, men hann letst ikki vita. Man sær eisini, tá ið hann skrivar um fakrørsluna og um ávís

pláss í Føroyum, so er tað við niðursetandi týdningi, men hann kennir nógv betur til tað, enn hann vil lata við seg koma.

Tað er gott fyri arbeiðsfólkið í Havn, at tað kann hava eina trygging, og tað er bara at gleðast yvir. Best hevði verið, um tann tryggingin kundi verið galdandi fyri heila Føroyar, og um tað er nakar tráður í tí, sum háttvirdi tinglimur er komin við, so skal tað sjálvandi fáa eina positiva viðgerð, tað er klárt.

Men veruleikin er tann harra Óli Breckmann, at arbeiðsfólkið runt um í landinum investerar nógvar pengar í yvir sítt fakfelag og yvirinvesteringar fyri at halda seg sjálvan við arbeiði. Tað er sannleikin, hetta skal ikki verða nakað við agitatión at gera, tað er bara veruleikin og sannleikin.

Men sjálvandi skal uppskotið fáa eína positiva viðgerð, og kann tað verða so, at tað kann bøta um viðurskiftini hjá hinum, sum ikki hava tað lukrativu forrætningina, sum eitur Tórshavn, har ið tað almenna hevur investerað. Tí støðan er tann Óli Breckmann, og tað veitst tú eisini, tú tosaði um, at tit vóru ikki so gamlir enn, at tú veitst eins væl, at Havnar arbeiðsmannafelag hevur eisini verið úti í investeringum og mist pengar, milliónir, so skulu vit fara at tosa um tað, so verða vit ikki lidnir í nátt, og tað skal eg lata vera við í kvøld. Eg skal ið hvussu er lova tað, at málini skulu fáa eina positiva viðgerð, og er tað neyðugt at innkalla fólk, so verða tey eisini innkallað, tí tað er gott at fáa upplýsingar, men eg neti kortini, at man kann ikki sammeta Havnina við útjaðaran, tað er skeivt, tí tað er størri øki, og tað eru tryggari arbeiðsviðurskifti í Havn enn runt um í landinum. Tað burdi ein so væl umtóktur politikari, sum Óli Breckmann ið hvussu er sambært atkvøðutalið tykist at vera.

Formaðurin

Eg skal siga til seinasta røðara, at tað skal tosast í gjøgnum formannin.

Herrik Old (jv)

Harra formaður.

Nú kundi eg í øllum førum taka tað eina burtur úr aftur aftaná, at seinasti røðari var uppi, tí eg hevði kritað mær nøkur orð upp til løgtingsmál nr. 46, men tað haldi eg, Sverre Midjord greiddi rættiliga týðuliga frá, hvussu tey viðurskiftini eru, tí tað eru ikki øll fólk í landinum, sum hava fast arbeiði. Nú kom ein lítil fløkja í hjá mær, við tað at málini komu øll í senn, so at eg tók nøkur við, sum eg klári at yvirkoma.

Tað var Tordur Niclasen, sum treiv í hetta, at man var eitt sindur negativur, man vildi ikki taka undir við øllum, men tað er ikki júst tað, at man vil ikki taka undir við øllum, ikki at detta í ta grøvina, sum eg var dottin í, at eg ikki kundi taka undir við øllum tí, sum var komið fram í kvøld, tí eg haldi, sumt av tí, sum fram er komið, er eitt sindur ívingasamt. Skal man taka undir við tí, so skal man eisini hugsa um, hvat tað kostar. Eg kanska eri vorðin eitt sindur ómodernaður, tað er møguligt, at man hugsar um, at alt hetta ymiska kostar. Tí hevur man ofta lyndi til at hugsa fyrst um, hvat kostar hatta, um tað nú er møguligt at taka undir við tí bara út frá tí ið hvussu er.

Løgtingsmál nr. 33 um útvarps- og sjónvarpsgjald meini eg avgjørt, at vit avgreiddu fyri stuttum. Tað varð hækkað við helvtini av útvarpsgjaldinum og helvtini av sjónvarpsgjaldinum. Eg veit ikki, um uppskotsstillarin hevur verið í tinginum tá, tað eri eg ikki heilt vísur í. Men tað eru nakrir mánaðir síðani, at vit viðtóku at hækka ljustudningin við 1.000 kr. frá 1.200 kr. til 2.200 kr., og tað varð skoytt upp í navnið olju- og samskiftisstudningur, haldi eg, tað varð kallað. Tað var also helvtin fyri sjónvarpsgjald og helvtin skuldi verða okkurt annað alment gjald, eg minnist ikki rættiliga, hvat tað var.

Tað má vera tann rætti vegurin, at man gevur pensionistunum hesar krónurnar, sum skulu afturat, tí hitt, at man sigur, at pensionistar skulu fáa helvtina av hesum gjaldi, tað kann verða rættiliga keðiligt fyri

pensionistarnar. Eg frykti fyri, at tá ið tað nærkast tíðini, tá ið útvarpsgjaldið kemur, so kann tað gerast eitt sindur av togan um hesi gomlu. Hvør skal nú hava hann inni, ákkurát tá ið rokningin kemur fyri sjónvarpsgjaldið, og hvør skal hava hann inni, tá ið rokningin kemur fyri útvarpsgjaldið? Tað kann henda tað, at armarnir verða nakað longri á teimum gomlu her, tað frykti eg fyri. Eg haldi, at handa loysnin, sum vit tóku í vár og góðu teimum hasar 1.000 kr. afturat, tað er so avgjørt at fyritrekkja fram um hetta, at man fer at togast um tey, og soleiðis kann tað gerast familjustrið burtur úr tí.

Síðani var tað løgtingsmál nr. 31: Skattalætti til inntøkur av útleigan. Hetta hevur verið frammi her einar tvær ella tríggjar ferðir. Eg veit ikki, um Sambandsflokkurin hevur havt tað frammi eisini. Óli Breckmann hevur mangan havt frammi her, at tað almenna er bólgnað ov nógv, tað almenna setir ov nógv fólk, og tað verða so og so nógv afturat. Um hetta ikki fer at toga tann vegin, eg trúgvi, at hatta grundstykkið uppi á Hálsi, sum talan er um at keypa, verður so nógv ov lítið, bara um ein brotpartur av hesum skal setast í verk, sum hesa løtuna, hesa hugnaligu løtuna, má eg siga, hevur verið frammi í kvøld. So sláa ikki 8.000 m² og heldur ikki 16.000m² til ei heldur hús av hesi støddini, sum talan hevur verið um her, men heilt, heilt onnur hús, tí tað skulu nógv hundrað fólk til at umsíta at róta hvønn kjallara runt og vita, hvør leigar og hvør, ið ikki leigar og hvør, ið gevur upp, sum hann skal.

Vit hava gjørt nakað annað í hesi samgonguni, og tað er tað, at skúlarnir eru lagdir út. Í staðin fyri at dragsa so nógv fólk sum møguligt inn í miðjuna, so hevur man hugsað um at leggja skúlar út. Studentaskúlin skal byrja í Klaksvík og í Suðuroynni, sjóvinnuskúli og aðrir við, tað má verða tann rættari mátin at ganga. Sjálvandi tekur hetta sína tíð. So eg rokni við, at tá ið eini tvey ella trý ár eru farin, so er bílætið vent rættiliga nógv.

Tað, sum eg skuldi tríva eitt lítið sindur í afturat, er løgtingsmál nr. 40, sum verður kallað:

Skattafrítøka av kirkjum og samkomum til at samsýna trúboðarum. Har vóru Óli Breckmann og Tordur Niclasen so rørandi samdir, men tað er altíð keðiligt at skuffa fólk seinasta døgnið serliga, men má eg siga, at her eri eg avgjørt ikki samdur við uppskotsstillaran.

Evørjar fylgjur, hetta kann fáa ikki minst fyri umsitingina, kann als ikki metast, og hvussu fer tað at síggja út ein dag, tá ið man í kirkjuni skal fara at krita sær niður, hvussu nógv man hevur latið í talvuna í dag t.d. Eg veit ikki, um nakar er inni her, sum arbeiðir sum deknur, men hann hevði fingið úr at gera at brúka allan sín sunnudag til at talt upp, hvussu nógv hevur nú hasin latið inn, og hvussu nógv hevur hin latið inn. Eg siti so frammalaga, at tað er so lítið komið í, tá ið eg sleppi niðurí, men tá verður tungt at fáa deknar, tað hevur verið ringt frammanundan. Skal man so fara at tosa um, at hesir, sum eita trúboðarar, teir fáa ikki løn, teir fáa eina samsýning. Eg skilji ikki, hvussu hatta verður lagt út. Eg fái eina samsýning, tá ið eg fari avstað, fyri tað, sum eg fiski. Fer ein maður til útróðrar, so fær hann eina samsýning fyri tað, sum hann fiskar, og sum hann avreiðir. Nú er tað knappliga ikki løn longur, tá ið tað er ein trúboðari, nú er tað ein samsýning. Eg kann yvirhøvur ikki taka undir.

Tá ið tað endiliga eisini verður nevnt her, um eg fái loyvi at lesa tríggjar reglur, at ein partur av trúboðaraarbeiðinum er kristniboðan, sum verður røkt av okkar egnu og stundum vitjandi útlendskum trúboðarum, og her segði uppskotsstillarin, at hetta ríkaði okkara kristnilív nógv. Har loyvi eg mær at ivast í stórum, tí at sumt av tí, haldi eg, "í den grað" togar tann skeiva vegin. So skal man fara at tosa um, at alt hetta skal verða skattafrítt. Hvør í allari víðu verð skal umsita, hvat ið hvør letur inn í gávum? Tað koma nakrir seðlar sendandi av og á í húsini hjá fólki niðurí frá, hvar man eftir donskum systemi hevur loyvi at lata nakrar krónur við skattafrádrátti, tað er donsk lóg sjálvandi, men eg havi ikki varhugan av, at tað hevur verið hugsanin hjá fólki í Føroyum, ikki innan fyri tað umráðið, sum eg havi hoyrt til, hevur man alla tíðina sitið í kirkjuni

og hugsað um, hvat man eg fáa burtur úr hesum, fái eg nakrar krónur burtur úr at lata nakrar aftur? Er man ikki komin eitt skeivt spor inn á kristniboðanina?

Um vit t.d. harra formaður søgdu, at ein trúboðari varð sendur út, tað kundi t.d. verið Óli Breckmann, og vit báðir avtalaðu, at nú lati eg ein rættiliga fíttan part av minari inntøku, tí Óli Breckmann fór á eina av sínum undaligu ferðum t.d., skuldi so tann føroyski skattgjaldarin rinda pengar til, at Óli Breckmann og eg funnu út av tí, at nú skuldi hann verða trúboðari? Hetta er virkuliga lagt út eftir tí gomlu hugsanini, sum var á hesum økinum.

Tað er møguligt, at Tordur Niclasen og Óli Breckmann hava uppfunnið nakað spildur nýtt innan fyri tað føroyska trúarlívið, tað, haldi eg, er alt, sum týður upp á í hesum uppskoti. Vit skutu eina konu úr útlandinum við, hví hon ikki kom í kirkju, vit vóru stoknir inn á gólvið á eini barr, hon segði, hon fyritrekti at sita á barrini og hugsa um kirkjuna og ikki sita í kirkjuni og hugsa um barrina. Her verður tað, at vit sita í kirkjuni og hugsa um, hvønn skattafyrimun, man kann fáa. Tá er man avgjørt komin á skeivt spor.

Eg vil ráða til, at man tekur hetta burtur aftur hiðani, hetta hoyrir ikki heima her eftir tí hugsan, sum eg havi um hetta.

Annars takk fyri, eg fái ikki tíð til at viðgera meira.

<u>Óli Breckmann</u> (ff) viðmerking

Harra formaður.

Hatta er eitt konstruktivt orðaskifti, eg takki hjartaliga fyri stuðulin. Tað er heilt týðuligt, at Henrik Old, æraði tingmaður er líka við at koppa yvir, hann skal bara hava eina lítla vegleiðing her. Men annars rokni eg við, at Poul Jacob Olsen hevur nokk so gott innlit, eg meini, at Sverre Midjord næstan eisini er kirkjutænari, so hann kundi eisini kanska líka sum hildið partamannin orienteraðan.

Eg trúgvi tí, at tá ið fólk uppgeva, hvat tey lata

í leigu, og tað er í lagi, skattavaldið noterar sær tað, so eiga vit at hava so mikið góða telduskipan, at vit upp á staðið kunnu siga, at ein persónur, sum hevur avlopspláss heima við hús, sum hann leigar út, eisini eigur at kunna fáa tað skrásett, uttan at skula seta fleiri fólk.

Viðvíkjandi trúboðarunum so hevur Henrik Old misskilt meg. Tað er ikki tann, sum letur, sum skal fáa tað skattafrítt, men uppskotið niðar ímóti, at samkoman, lat okkum siga, at Tvøroyrar kirkju bíleggur ein brandprædikumann sum Søren Krarup t.d. ella Jesper Langballe, Ulrik Høj, Peder Duetoft, krútprædikumenn, borgarligir um ein háls, kunnu siga fólki ta veruligu uppfatanina av fjallataluni, men "lad gå" við tí, har eru Sverri og eg sjálvir ósamdir, tað er í lagi, so má Tvøroyrar kirkja ella KFUM í Klaksvík ella Filadelfia ella Evangeliihúsið ella Tjaldmissiónin, so mugu tær samkomurnar sleppa frá at skula savna 20.000 kr. inn, harra formaður, tí teir skulu samsýna einum trúboðara 10.000 kr. netto, tað er hetta, uppskotið snýr seg um, tað er fyri at sleppa teimum smærru samkomunum undan at savna dupultar pengar inn til at rinda einum trúboðara soleiðis, og eftir lógini, sum hon er nú, harra formaður, so má hann lata helvtina aftur av tí, sum hann fær, í skatti. Tað verður so tungt hjá samkonunum at klára at rinda trúboðarunum, teir klára tað ikki.

Sverre Midjord (jv) viðmerking

Harra formaður.

Nú nevndi háttvirdi løgtingslimur Óli Breckmann í samband við henda frádráttin og hesar gávurnar Tvøroyrar kirkju.

Eg skal bara upplýsa Óla Breckmann, sjálvt um hann hevur skrivað okkurt annað í Dagblaðnum, at Tvøroyrar kirkja hevur eina serstøðu í Føroyum. Bygdafólkið saman við vinnulívsmonnum á Tvøroyri bygdu sær sitt egna samkomuhús, hvør einasti arbeiðsmaður arbeiddi eina viku, ein vika av hansara arbeiðstíð fór til kirkjuna, tað varð ikki trekt av skattinum, harra Breckmann.

Adolf Hansen (Fr)

Harra formaður.

Her er eitt løgtingsmál, sum hevur nr. 46. Eg fari at biðja formannin um loyvi til at stilla spurningar til uppskotsstillaran, eg haldi, her er so nógv ósvarðað, gjøgnum formannin sjálvandi.

Tann fyrsti spurningurin í hesum málinum, kanska tann einasti, hann skal verða: Hvar skulu hesir pengarnir koma frá, og er tað gjørt nøkur sum helst rokning upp á hetta? Her stendur, ja, nú veit eg ikki, um eg finni tað aftur, tað er so nakað heilt annað, jú, her stendur í viðmerkingunum, ikki í lógini, men í viðmerkingunum: Ætlandi kostar ein altfevnandi samtrygging, sum henda uppskotna, millum 5 og 9% av ársløninni hjá tryggingartakarunum. Henda peningahædd t.d. upp til 10.000 kr. eigur at kunna dragast frá í skattinum, sum kostar landskassarum nakrar fáa 10 mió.kr. í inntøku árliga í fyrstani. Tað kostar 150 mió.kr. fyri 25.000 fólk, tað er tað, tað kostar landskassanum, hvørki meir ella minni, eg havi roknað tað út og tað er rætt roknað. Eg havi lisið hesa lógina ígjøgnum, og her stendur í grein 10, inngoldna tryggingargjaldið hevur fráðráttarrætt frá skattskyldugu inntøkuni hjá tryggingartakaranum við upp til 10.000 kr. So havi eg roynt at leitað, eg havi lisið tað frameftir, og eg havi eisini roynt nærsagt at verið í bakkgear, men eg dugi ikki at síggja, hvussu hesir pengar skulu koma inn. Eitt er at koma við eini útreiðslu og siga, at tað kostar so og so nógv, men tað skulu pengar til, hetta er jú ein stórur postur. Hetta er ein postur upp á fleiri 100 mió.kr., ið talan er um. Tá talan er um ein post upp á fleiri 100 mió.kr., so er tað púra givið, at tað er neyðugt, at fáa eina tilsvarandi inntøku, tí eg haldi, at avlopið fyri 1977, eg haldi, at eg sá á einum pappíri her, var 270 mió.kr. og tað er einanstandandi, men tað kemur av, at stýrið sum sat inntil á páskum, kom við ov nógvum inntøkulógum, nokk fyri at spara, men tað hevur tíðanverri ikki bara ein sparandi virkning, og nakað av ti, sum Óli Breckmann hevur ført fram, er í og fyri seg rætt, hann hevur ið

hvussu so er lurta væl eftir, hvat onkur annar hevur sagt og hevur líka sum fangað tað, og tað er gott, tí tað er ikki bara at taka skatt inn og halda, at so minkar man forbrúkið. Nei, tíverri er tað soleiðis, at vit hava eina alt ov nógv brúkta harmoniku nevnliga tað, at kunna fara í bankarnar og taka eitt lán.

Mín fyrsti fyrispurningur gjøgnum formannin sjálvandi var hetta, hvar skulu pengarnir koma frá, og nær kemur tann lógin? Eg haldi, at hon skuldi komið fyrst. Her verður sagt, at hetta verður ikki sum tann samhaldsfasta, her koma pengarnir beinanvegin. Men hvar koma teir frá? Tað má koma eina ella aðra staðir frá, tí her er eingin inntøka til teir. Nú veit eg ikki, um tað er eitt av hinum 21 uppskotunum, eg havi ikki lisið øll ígjøgnum. So stendur í grein 5 við formansins loyvi. Útgjalding við deyð áðrenn 67, so stendur 60 ár. Eg veit ikki um hatta er maður og kona, ella hvat tað er, sum – spælir inn har, tað má vera ein forkláring upp á hatta har, og tað kanska vit faa.

So fara vit frá hasum harra formaður, fyri ikki at brúka alla tíðina, til eitt, sum eitur nr. 40, tað eitur skattafrítøka av kirkjum og samkomum, tað er navnið. Minnist meg rætt, so stendur í einum av teimum fyrstu greinunum í skattalógini, at kirkjur og samkomur og politiskir flokkar eru skattafrír, men um peningurin, sum inn kemur fer víðari til løn ella samsýning ella gávur til privatar persónar, so skal skattur gjaldast. Vit kunnu sjálvandi byrja at pilka við hetta, at taka skattin frá teimum, sum boða evangeliið, men so er spurningurin, hvar setur man markið?

Í eini samkomu eru ótrúgliga nógvar uppgávur, nógvar smáar tænastur og øll hesi eru snáir trúboðarar. Hvør skal sleppa undan skatti har og hvør skal ikki sleppa undan skatti? Tað verður nevnt í viðmerkingunum, at eitt fjølment lið av føroyingum, sum eftir at hava givið keisaranum, tað ið honum tilkemur, letur dyggan fíggjarligan stuðul til kirkjur og samkomur sínar. Hatta er rætt, sum hatta er sagt og byrjanin av hasum har er sitat í bíbliní, men bibilin segði einki um tað, at trúboðarin ikki skuldi gjalda skatt. Sjálvt Jesus lat

skatt, hann lat skatt, tí skattur skal latast. Tá ið tað stendur, gevið keisaranum tað ið keisarans er, so er tað eisini galdandi fyri trúboðarar.

Vit lesa víðari í seinasta pettinum við formansins loyvi. Her stendur, okkara kirkju- og samkomulív verður andiliga ríkari og røkkur har við longur í kristniboðanini og sosiala virkseminum, um kirkjuliðið, missiónin og fríu samkomurnar høvdu sloppið undan skattaskyldu av trúboðarasamsýning. Nú kunnu vit klippa allar teir innskotnu setningarnar burtur og so, so stendur: Okkara kirkju-og samkomulív verður andiliga ríkari, um kirkjulið høvdu sloppið undan skattskyldug, tað verður ikki andiliga ríkari, tað verður andiliga fátækari av tí. Tey bróta eitt av bíbliunar boðum, nevnliga hetta, gev keisaranum tað, ið keisarans er.

Nú er tað misjavnt frá kirkjulið til kirkjulið og nú er nevnt her um kirkjulið, her er nevnt um missiónir og her er nevnt um fríar samkomur. Øll hesi nøvnini koma frá sama greska orðið ecclesia bara umsett ymiskt, Victor brúkar eitt, og Dahl brúkar tvey orð fyri tí, men tað týður alt tað sama, og tað kemur upprunaliga frá hesum útikin. Ecclesia meinast við úttikin. Tað er ójavnt, sum hesi úttiknu, um man kann brúka tað beinleiðis orðið, hvussu tey, hvørt í sínum lagið gjalda til sítt kirkjulið.

Nú hevur tað verið nevnt her um, hvussu man ger í fólkakirkjuni, og tað er ein máti og ein annar, sum hevur verið brúktur av onkrum, tað er hetta, at man fer antin einaferð um árið ella einaferð um mánaðin runt í húsini við ein konvolutti, og so heintar man ein afturlatnan konvolut aftur, og har liggur so penirgur í, tað sum tey føla, at tey skulu geva til tað arbeiðið, og tað er ójavnt, summa staðir gongur ein bússa runt. Tað er so ómetaliga ymiskt, sum tey lata, men eg havi ikki upplivað tað, at pengar hava mangla, havi ongantíð upplivað tað, at pengar hava mangla, men er nan farin at spara, at verða gírigur, so hava tey mangla, men so leingi man letur teir væl og skilagott út, so kemur tað altíð líka nógv innaftur og meira enn tað, sum fer út. So eg fari at siga, sum eg segði, tá ið Jóhanes Martin hevði eitt

uppskot her fyri einum hálvum ári síðan ella gott og væl tað. Eg haldi ikki, at vit skulu fara og leggja okkum út í hatta, tí hatta virkar frálíka væl í øllum teimum úttiknum ella øllum teimum føroysku kirkjuliðunum.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Adolf Hansen skuldi verið tann fyrsti at vita, at tað virkar ikki so væl, sum man vildi vónað, at tað gjørdi. Nú er hann skriftlærdur, tað eri eg ikki tíverri, tað er ein av teimum nógvu fyrimununum, hann hevur frem um meg, men tað einasta eg veit um skatt sambært bibluna, tað eru tíggjundir, Adolf veit óivað, um skattatrýstið í bíbilskum tíðum var harðari enn tíggjund. Um tað var vanligt tá, ella biblian ikki fyriskrivaði nakað annað eitt ávíst prosenttal, so kundi Adolf, um hann var konsekventur í øðrum málum politiskt enn bara í hesum her landsskattatrýsti eftir ti tíggjundi, sum biblian fyriskrivar, so skuldi eg tikið hattin av fyri hansara konsekventi, men eg trúgvi ikki, at hann klárar tað.

Harra formaður. Hvat 60 og 67 ár viðvíkur, so er tað at siga, at tað nevnliga vísir ein av teimum mongu fyrimununum við hesum uppskotinum um samtryggingina, nevnliga, at tað er eitt ávíst valfrælsi í henni. Orsøkin til, at ein slík trygging fer at virka beinavegin í staðin fyri, man má bíða til langt inn í 90ini, er, at hetta er ein trygging og ikki ein grunnur, sum fyrst má samlast upp í, og sjálvandi so skal nakað brúkasta av til scsialiserandi endamál á vegnum og kanska allar tíðir, tað er ikki uppgávan hjá eini trygging. Ein trygging hevur eitt heilt ávíst system, hon virkar eftir einum heilt ávísum prinsippi, tað er eitt óalmindiliga innviklað prinsipp, tí hevur man bara havt møguleika við hesum uppskotinum at skrava yvirflatuna á einum so dagligum systemi sum hesum. Men eg vóni, at fíggjarnevndin gevur sær stundir til at viðgera hatta málið í tí álvara, sum tað hevur uppibori.

So skal eg leggja tvey ting aftrat harra formaður.

Tað er, at her er eitt uppskot til samtyktar um hálvt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri pensionistar og fólk undir útbúgving. Nú hevur vist okkurt verið um hetta, at man hevur latið pensionistum eina samsýning í staðin fyri, sum skal fungera sum eitt útvarps- og sjónvarpsgjald, tað er ein máti at gera tað upp á. Eg haldi, at tað kom inn saman við einum oljustudningi ella okkurt slíkt, men eg skal ikki vedda upp á tað, og tað var kanska tað, sum gjørdi, at eg helt, at faktisk var tann uppgávan ikki heilt røkt við hesum hálva útvarps- og sjónvarpsgjaldinum, men nevnliga tað, at man gevur við aðrari hondini og tekur aftur við hinari, fyribyrgir hetta uppskotið her, men eg fari at heita á formannin um, at hetta uppskotið verður koyrt í sosialu nevnd um tað kann, nr. 33, og at uppskotbroyting í útvarpslógini verður koyrt í fíggjarnevndina og ikki í skattanevndina. Annars hevði eg ikki fleiri viðmerkingar í hesum umfari.

Adolf Hansen (fr.) rættleiðing

Harra formaður.

Nú var tað soleiðis, at Óli Breckmann ynksti, at eg skuldi kunna liva eftir bíblini, og tað má eg tíverri ásanna, at eg klári ikki, men eg taki tað sum eitt tekin um, at eg eri eitt menniskja og bara eitt menniskja.

Tummas Arabo (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Eg havi bara nakrar viðmerkingar til tað, uppskotið sum eitur nr. 46, og viðvíkur pensión. Hetta uppskotið uppfati eg sum, eitt uppskot um at avtaka ta samhaldsføstu pensiónina, sum varð samtykt her í tinginum í vár.

Nú er tað um uppkotið hjá Óla Breckmann, ella tað er eitt fólkafloksuppskot. Eg hugsi, at tað nokk er bæði. Tað er so ógvuliga ringt at døma um ein flokk, tá ið man hoyrir tað í dag, tað varð spurt, um Fólkaflokkurin stóð við um undirsjóvartunnilin um Vestmanna-

sund, tá varð tað sagt her, at ein sjeyndapartur var lopin frá, tí at ein avtala galt bara, til henda psykiska støðan uppstóð, tað var orðarætt sitera, tá ið tann psykiska støðan uppstóð tá ið man kundi leypa frá. So er so ringt, at viðgera hesi tingini. Eg rokni við, at Óli Breckmann roknar við, at tey 6 í Fólkaflokkinum fáa hesa psykisku støðuna og leypa til hetta lógaruppskotið. Tað, sum hendi í vár, tá ið samhaldsfasta pensiónin varð samtykt, tá kendi man tað sama í samgonguni, sum Óli Breckmann hevur viðgingið í sínum uppskoti, at fólkapensiónin er ov lág, og so er tað, hvussu man fær lønarhækking til eldra fólkið hjá okkum. Samgongan metti og lóggav á tann hátt, at hon vildi krevja inn prosentir av útgoldnari løn, og prosentir skulu verða galdandi eins fyri høgar og lágar inntøkur. Fólkaflokkurin vildi í fyrsta umfari ikki hava hesa pensiónina, í øðrum føri, vildi hann hava tað í skattalógina, tað vóru fleiri uppskot har um at hækka fólkapensiónina yvir skattalógina. Okkara svar upp á tað var, at vit vilja ikki fara einaferð aftrat at krevja inn yvir skattalógina og hækka figgjarlógina, so alt tað órættvísið, sum liggur í skattalóg, avskrivingum, nul skattýðarum o.s.fr. skal førast viðari í hesari innkrevjingini. Vit vilja fara inn eftir teimum lønum, sum verða útgoldnar og teimum lønum, sum verða móttiknar. Vit undirstrikaðu tá, at tað er púra einki til hindurs fyri, og tað er galdandi framvegis í dag, at aðrar pensiónsskipanir eru galdandandi, tað er frítt fyri ein og hvønn at tekna eina og hvørja pensiónsskipan, tað verður seg verkfrøðingar, tað verður so onnur yrkisfeløg, tað verður seg Havnar arbeiðsmannafelag og øll onnur fakfeløg. Tað, sum ikki er gjørt innan fyri øll yrkisfeløg, sum man ikki kom inn á í vár, sum man roknar við at fakfeløgini sjálvi taka sær av og sum Havnar Arbeiðsmannafelag fyrimyndarliga hevur gjørd, tað er at tekna eina lívstrygging fyri sínar limir, tað er nakað, sum manglar, og tað má man bara vóna, at hini yrkisfeløgini finna út av at gera.

Viðvíkjandi sjálvari pensiónsskipanini annars fari eg ikki so nógv inn á tað í hesi náttartíð, men at tað verður so ein vanlig trygging, ein pensiónstrygging í

tryggingarsambandinum, hon stendur ofta í lutfall til ta inntøku, man fær útgoldna, tjenar tú lítið, so er eftirlønartryggingin eisini lítil. Vit hava eisini hoyrt tað frá formanninum, í ráðgevandi nevndini, í hesum eftirlønargjaldinum at henda uppsparingin, sum verður framd í samfelagnum, vil økja nýtsluna ógvuliga nógv í framtíðini. Eg veit ikki, vit tosa um, at fólkapensionistarnir fáa ov lítið, og vit ætla at geva teimum knapt nokk tað, sum teir skuldu fingið, so hvar henda øgiliga nýtslan kemur frá, tað dugi eg ikki reiðiliga at síggja. Mín kunnleiki til tað eldra fólkið í Føroyum er, at tað man nokk verða tann parturin av fólkinum, sum royna at leggja nøkur oyru á kistubotnin beinavegin, tey hava tað, so eg dugi ikki at skilja, hvat formaðurin í ráðgevandi nevndini sipar til er ógvuliga líkt at úttala seg um forhold, sum hann nokk ikki reiðiliga hevur kunnleika til í hesum landinum. Men eg havi so eg ikki meir at siga um hetta uppskotið og vóni, at tað fær eina sakliga viðgerð í tí nevnd, tað fer í, men eg vil siga, uttan at hava tosað við allan Javnaðarflokkin um tað, at vit ganga ikki inn fyri hesum uppskotinum.

Óli Breckmann (ff.) viðmerking

Harra formaður.

Nú nevndi síðsti ærðaði talari nevniliga hetta rættiliga kaldliga úttalilsið, sum ráðleggingarnevndin gav tí samhaldsføstu pensiónsskipanini, og eg hugsi eisini, at samgongan hevði rættiliga drúgva tíð um at finna ein form, sum man helt, kundi brúkast, og at tað so var ein óheppin formur, sum hvørki hevur avlamispensión ella avlamistrygging við sær, heldur ikki hevur eina lívstrygging, ikki hevur nakað valfrælsi, ikki kann útgjaldast í einum, um nan ynskir tað og ikki fremur nakra uppsparing sambært ráðleggingarnevndini, ikki fer at virka fyrr enn langt inni í 90unum, tað vil siga, at tað heldur ikki núverandi pensionístum samstundis sum hon spreingir skattaloftið úr 50% upp í 54%, økir forbrúkið, leggur meira trýst á arbeiðsmarknaðin, hækkar lønarútreiðslurnar o.s.fr. So hevur henda skipanin, sum

vit hava skotið upp, allar teir mótsettu virkningarnar, og tí skilji eg ógvuliga væl, at Javnaðarflokkurin ikki tekur undir við teimum, og tað er bara trist.

Eg vóni, at tað eru nakrir, eg vil ikki siga rættvísir, sjálvandi kann eg ikki avgera á sama hátt, sum teir avgera í heilum um eg eri rættvísur, so fari eg ikki at taka definitiónsrættin upp á teirra rættvísi heldur, men eg vóni, at tað er onkur, tí tað eru kanska ikki allir, sum ætla sær inn aftur í løgingið, eg skal ikki útpeika nakran, sum heldur, at hann hevur gjørt nokk og fegin vil hav frið nú. Poul Jacob Olsen kanska, meini eg, hevur gjørt vart við, at hann stillar ikki uppaftur, men tað skal eg ikki taka nakra avgerð fyri hann um, men kanska okkurt slíkt kundi verið, sum fekk onkran javnaðarmann kanska til at fáa eitt vist forstáilsi, at verða eitt sindur tolerantur og koma til fornuft og kanska leita aftur á gamlar gøtur, har teir einaferð ikki vóru so fremmandir harra formaður, man veit eg ikki. Vónandi hevur uppskotið ein kjans, og íð hvussu so er, krøki eg meg krampagtiga fastan í eina viðmerking frá síðsta æraða talara, og hann skal hava takk fyri ta sáttligu viðgerð, hann gav málinum tá hann segði, at Javnaðarflokkurin fór at geva málinum eina sakliga viðgerð, tað skal hann undir øllum umstøðum hava hjartaliga takk fyri. Har heingja við okkara vónarinnar hatt, harra formaður.

Formaðurin

So eru tað ikki fleiri, sum hava biðið um orðið. Orðaskiftið er endað. Tingmál nr. 30 verður beint í skattanevndina, somuleiðis tingmál nr. 31 og tingmál nr. 32 fer eisini í skattanevndina, tingmál nr. 33 fer í almanna-og heilsunevndina, tingmál nr. 38 fer í skattanevndina, tingmál nr. 40 fer í skattanevndina, tingmál nr. 43 fer í fíggjarnevndina, tingmál nr. 46 fer í skattanevndina.

Síðan kemur til viðgerðar 1. viðgerð av tingmáli nr. 26 tað er: Ókeypis rætting av tonnum hjá børnum?

Óli Breckmann (Tf.)

Harra formaður.

Vit, sum í barndóminum slóust við skeivar tenn, vita, ið hvussu so er, hvat liggur í hesum uppskotinum. Tær vóru kanska verri at passa, enn tenninar hjá øðrum, tey kundu altíð lata munnin upp og smílast breitt frá oyra til oyra harra formaður, meðan vit onnur gingið kanska runt og hildu fyri munnin. Tað var ein elendig tíð, tað var ikki altíð lætt at vera barn tá, men nú hava børn tað hóast alt soleiðis, at tey hugsa ikki um, um hol er í gólvinum og um livurpostejin kanska er nakað torna á breyðnum, mjólkin var súr, vit fingu ½ litur um dagin, og vit fingu ein hálvan tíma vatn um dagin frá kommunalinum, hatta er alt broytt. Ikki fyrr enn eg eri konin niður til Bretland sum 19 ára gamal, har teir høvdu eina ordiliga tannlæknarøkt, eydnaðist tað í ein vissan um at fáa nær sagt kjaftin upp á pláss, harra formaður, nei, at fáa rætta tenninar inn og tað var gjørt ókeypis.

Eg kom í góðar hendur, ein professari tók sær kærliga av mær, og vit arbeiddu, meðan allir studentarnir hugdu at, við kikarum á periskopum og øllum møguligum røttum støðum, meðan teir spakuliga ár um ár fingu líka sum lora hetta gebissið so nøkulunda, har sum tað hoyrir heima á tanngarðinum. Eg sat mangan og hugsaði um, hvat tað var fyri krotusmiðir, millióningar allir samlir, vinstrahallir eisini. So hvørt sum bevistheitin hjá mær vaks, so øktist eisini frustratiónin á ein hátt misnøgdin og rasaríið við hesar krotusmiðirnar, sum høvdu misrøkt sína uppgávu, helt eg sjálvur, men eg dugi at siggja nú, at tað kanska eisini hevði sínar orsøkir burtursæð frá tí teknisku óvitanini og fávitskuni. So eisini hetta, at eitt økið, líggur eftir enn, eitt økið sum náttúrliga skuldi verið langt síðan fingið upp á pláss, men sjálvandi tá ið tey flestu hava beinar og vakrar tenn, so er tað altíð ringt at hugsa um okkum onnur. Hvør veit, kanska verður tann dagur, tá ið man kann standa uppi í løgtinginum her og krevja, at ung fólk, sum missa hárið, fáa ókeypis transplantatión ella

ókeypis kinesiologiska viðgerð soleiðis, at vit hava flott faks sum tingformaðurin og Sverri Midjord og Flemming Mikkelsen og aðrir sum hava verið hepnari enn onnur, men trupulleikin er altíð hetta, at tey hava líka sum lyndi at gloyma tey minni mentu, tey undirpreviligeraðu, men her hava vit ið hvussu so er ein kjans til at bøta um nakað, sum løgtingið hevur forsømt í nógv ár nevnliga at geva børnum ein møguleika at fáa eina tannarøkt við rætting av tonnum soleiðis og so koma nøkur góð orð, haldi eg, um eg sjálvur skal siga tað, um eingin annar kann rósa mær, so verið eg noyddur at gera tað sjálvur, at ein grundregla má verða, at fíggjarligar orsøkir hjá foreldrum ikki foðra børnum ið at fáa skeivar tenn rættaðar. Kenni eg hetta løgtingið rætt, harra formaður, so veit eg, at hasin tankin slær á teir røttu streingirnar í djúpastu hjartarótunum hjá tingmonnum.

Harra formaður. Í fullvissuni um, at málið er í góðum hondum, mæli eg til og vóni, at tingið tekur undir við tí, at hetta nyttuga, neyðuga og sjálvsagda mál fær viðgerð í sosialu nevnd, men eg haldi, at tað skal í heilsunevndina, man tað ikki verða tað rætta? Eg haldi tað. Takk fyri.

<u>Sverre Midjord</u> (jv.) viðmerking

Harra formaður.

Hesuferð kom Óli Breckmann 20 ár aftan á okkum har suðuri. Øll børn í Tvøroyar kommunu, sum hava trupulleikar við tonnunum fáa tað goldið. Tí tað er ein stór rokning Óli Breckmann, tað snýr seg um nógvar 1000 kr. hjá teimum. Tí skal eg taka undir við hasum uppskotinum, men tað er bara 20 ár ov seint, at tú gjørdist so mikið sosialt hugaður, at tú fann út av, at tað eru nøkur børn sum hava brúk fyri hasi hjálpini, men tað eru ikki so nógv, tað eru nøkur einstøk og har suðuri hjá okkum hevur handa skipanin verið galdandi. Fyri 25 árum síðan byrjaði tað. Takk fyri.

Heini O. Heinesen (tf.) viðmerking

Harra formaður.

Man sigur, at blind høna finnur eisini korn. Men henda hønan hevur so ikki funnið nakað korn. Eg kann siga tað sama, sum Sverre, hetta hevur verið galdandi í Kunoyar kommunu í fleiri ár, eg veit ikki hvussu nógv, eg veit ikki, um tað eru 20 ár, men í 10 ár hava øll børn fingið fría tannarætting. So at koma í løgtingið við hesum nú, tað haldi eg er ógvuliga seint. So var tað hetta, at prædikumenn eru borgarligir og tannlæknar eru vinstravendir.

Eyðun Viderø (ff)

Harra formaður

Eg má siga, at tað harmar meg eitt sindur at sita her á tí høga tingi og konstatera, at menn, sum hava respekt fyri sær sjálvum, taka orðið fyri at standa her og halda skemtiligar talur upp á forhond. Tað kann ymiskt stuttligt koma fram, men eg haldi tað, at hesin pallurin er meiri, hann skuldi verið hægri enn tað, at man bara kemur upp her bara fyri at standa og flenna, tað vil eg halda. Eg havi ikki nevnt nakran persón, seinasta, eg sá, var háttvirdi tinglim Heini O. Heinesen, sum kom upp her, hann fienti áðrenn hann kom upp, hann fór niður aftur, og hann flenti framvegis. Eg haldi, tað er spell uttan at taka nakað frá nøkrum og leggja afturat hjá nøkrum øðrum.

Hetta málið, sum var til viðgerðar var økeypis rætting av tonnum hjá børnum. Hetta er nokk eitt nógv størri mál, enn kanska mangur, sum ikki hevur trupulleikar av tí, heldur.

Nú komið eg sunnan av Sandoynni, og har eru væl børn júst sum alla aðra staðni, sum hava trupulleikar við tonnunum. Eg havi eisini verið til at viðgjørt fíggjarina av hesum tonnunum, tí eingin almenn skipan er fyri tí, og har er hent tað, at summar kommunur hava gjørt tað at, tær hava átikið sær at rindað rokningarnar fyri børnini, tá tey fara til sertannlæknaviðgerð at

rætta tenninar upp, tí tær vita tað, at útsjóndin hjá einum menniskja hevur stóran týdning , vit hava tað øll, man vil síggja toliliga gott út, man kann ikki gera við alt, og tenninar týða rættiliga nógv um tær ikki eru í lagi burtursæð frá, at man misrøkir tær við ikki at bústa tær og tær so brenna, men tær kunnu vera skeivar o.s.fr., ella sita ikki saman. Har hava summar kommunur hjálpt við til at gera tað.

Tað er ein serjáttan, um ein kommuna yvirhøvur gongur við til at játta pengar til at rætta tenn hjá børnum, tað er rættiliga kostnaðarmikið og í summum førum verður tað roknað sum ein eykaútreiðsla hjá summum familjum, og vit kunnu kalla okkum so øgiliga rættvísar, sum vit vilja, men tá kemur man út fyri tí, hví skulu vit játta pening til so nógv, og onnur fáa ikki nakrar pengar. Tí haldi eg, at hetta uppskotið als ikki er so óviðkomandi, og heldur ikki at fjenna at sum summir gera tað til, hetta er rættiliga týdningarmikið. Eg kenni

sjálvur til har suðuri á Sandoynni, hvar man hevur eina felags tannaviðgerð á Meginskúlanum og júst í hesum døgum er til viðgerðar og til avgerðar eitt uppskot frá tannlækanum hvar ið kommurnar eru bidnar um at taka støðu til, um tær vilja vera við til at gjalda, so at øll børn sum hava keðiligar og skeivar tenn, kunnu fáa rætta, so tey fáa eina, eg vil siga normala útsjónd. Tað er so vítt eg veit samtykt av øllum kommunum, men eg veit, at okrar kommunur frammanundan ikki hava gjørt tað. Tað vil siga, at børn í summum kommunum kunnu gera tenninar í ordan, tí at kommunan rindar tað, og í øðrum førum er tað bara, um so foreldrini vilja rinda tað, sum tað kostar, tað er rættiliga dýrt at fara til hesa her serviðgerðina.

Tí vil eg mæla almanna- og heilsunevndini til at viðgerða hetta uppskoti við alvarsemi, tí hetta uppskotið er ikki nakað, man eigur at flenna at.

Takk fyri harra formaður.

Tordur Niclasen (kfff.)

Harra formaður

Nú haldi eg ikki, at teir, sum hava trekt upp á smálibondini her, hava gjørt tað, tí teir vildu hesum uppskotinum so illa, tað haldi eg, at eg loyvi mær at viðmerkja til seinasta æraða røðara. At teir, sum hava trekt uppá smálibondini ikki hava gjørt tað við tí meining at skaða fyriliggjandi uppskot, men tá ið saman um kemur og kl. er farin av 01³⁰, so hevur tað víst seg sum ein reyðan tráð í gjøgnum hetta kvøldið, hesa náttina, tað hevur verið ein ávísur humoristiskur stemningur her í tinginum, tó ikki bara í samband við fyriliggjandi mál.

Harra formaður. Tað er rætt, so tað verður mær langt frá at flenna at sjálvum uppskotinum, tað verður mær langt frá tí. Men eg haldi nettup, tað undirstrikar týdningin av, at børn við skeivum tonnum fáa møguleikar, at fáa tær rættaðar, tí nettup tað, at tey hava skeivar tenn, kann verða ein forðan fyri at tey flenna normalt, um eg so má siga, sum fleiri onnur gera. Tey eru tarnað í tí at opna munnin, tað er jú einaferðina, tað liggur í "sagens natur" at muðurin má opnast fyri at kunna flenna, ið hvussu so er hjartaliga.

Harra formaður. Eg taki undir við tí, at málið fer í ta nevnd, sum tað er skotið upp, og onkur limur í tí nevndini er her til staðar, so eg fari at heita á viðkomandi at hava tað við í viðgerðini, og tað kundi verið áhugavert at sæð í hvønn mun hendan ókeypis hjálp verður víst og sýnd kring landið. Nú hevur æraði løgtingslimur Sverre Midjord verið her uppi og sagt, at á Tvøroyri hevur honda skipanin virkað í 25 ár, og tað er alla æru vert, vónandi hevur tað í sær sjálvum ikki haft nakrar økonomiskar trupulleikar fyri Tvøroyrar kommunu.

Harra formaður, Heini O. Heinesen æraði tinglimur var eisini her og nevndi, at í Kuncyar kommunu hevði tað virkaða í 30 ár, tað er eisini alla æru vert, 10 ár orskað harra formaður, tí kundi tað verið áhugavert.

Nú er tað soleiðis, at vit tíbetur hava eina skipan, sum ger, at fólk, sum hava viðgerð fyri reyðuni av ymiskum øðrum slag, kunnu innleggjast á sjúkrahús og fáa viðgerð ókeypis, nú tosa vit um skeivar tenn her, t.d. útsjóndin kann koma til sjóndar upp á nógvar mátar eitt

nú skeiv eyrir, skeiv nøs ella, hvat annað kann vera skeivt, so ber til harra formaður, so ber til at fara til lækna og fáa eina innleggjan á sjúkrahúsið, og har fáa viðgerðina ókeypis, og tí skuldi man hildið, at tað var líka so náttúrligt, at henda ókeypis viðgerðin eisini fevndi um skeivar tenn, her hjá børnum í skúlaaldri.

Harra fromaður. Eg haldi sjálvur hetta er eitt ógvuliga áhugavert uppskot, sum eigur at fáa eina seriøsa viðgerð í tí nevnd, sum skotin er upp. Takk fyri.

Eyðun Viderø (ff.) eina viðmerking.

Harra formaður

Tað var seinasti æraði talari Tordur Niclsen, sum sum hevði eina viðmerking, um at eg segði tað, at hetta málið helt eg vera ov álvarsamt, at man møtti upp her á tingsins røðarapalli og fór at trekkja uppá smílibondini, og seinasti æraði talari Tordur Niclsen segði tað, at Eyðun Viderø átti at umbera seg og aðrar, tí tá tað var farið um midnátt, tá kundu tingmenn ikki so væl halda sær, tí teir vóru líkasum við at missa tráðin, tí teir vóru við at vilja illa sova, og í tí sambandi vil eg heita á formannin framyvir og eisini í hesum føri, at tá ið tingviðgerðin kemur so nær midnátt o.s.fr. fyri at tryggja okkum, at málini fáa eina seriøsa viðgerð, uttan at vit fara upp at smílast, so er tað betri, at man steðgar viðgerðina og tekur hana upp aftur morgunin eftir, tá ið menn hava sovið, eg haldi tað tænir málinum betri. Takk fyri.

Formaðurin

Eg skal umhugsa hesa vinarligu áheitanina, men nú er tað soleiðis, at summir tingmenn hava frægast við at smílast um morgunin.

Tordur Niclasen (kfff.) viðmerking

Harra formæður
Nú varð eg eitt sindur skeivt endurgivin av æraða

tinglimi Eyðun Viderø, tí eg vísti til, at tað líkasum hevði verið ein humoristiskur dámur yvir viðgerðini, einum stóri parti av viðgerðunum í kvøld, og ein forklaringin kundi nokk verið tann, at klokkan var blivin so nógv, so tað var bara tað, sum eg skuldi skoyta uppí.

Jákup Lindenskov (jv.)

Harra formaður.

Hetta er eitt uppskot til samtyktar og tað hevur verið nevnt her, at málið eigur at verða viðgjørt í sosialu nevdini. Nú havi eg tíverri ikki havt høvi til at hoyra alt orðaskiftið, men tað er líkasum, um tað verður sagt her, at her er eitt heilt og stórt glopp í okkara heilsuverndarskipan, tað er ta nú ikki, men hetta málið skal sjálvsagt verða virðiliga viðgjørt í almannanevndini. Men tílíkir skeivleikar, sum skeivar tenn, tað er eitt mál, sum verður ógvuliga gjølliga viðgjørt og hevur verið gjølliga viðgjørt í landsstýrinum og heilsumyndugleikum gjøgnum nógv Harrans ár.

Eg fari ikki at siga akkurát, hvussu skipanin er í dag, men tað er í nógvum førum, at tað almenna ber kostnaðin av at rætta tenn hjá børnum, men eg veit, at har er okkurt, sum haltar, og tað er alla æru vert, at eitt tílíkt mál kemur fram og verður umrøtt her á tingi, og eg skal bara siga, at vit skula viðgera tað við vælvild. Men eg vil bara einaferð afturat siga, tað er soleiðis, at eitt tílíkt mál sum hettar yvirhøvir ikki hevur, um eg so má siga, nakran dekning hjá ti almenna.

Nú hava nógv mál verið frammi upp á nakrar fáar tímar og verið nýframløgd, og tað er ymiskt, sum vit hoyra, tingmenn hava rætt. Summir hava tosað nokk so nógv um at vit mugu seta skattin niður, um vit skulu hava eina framtíð í hesum landinum, men tað er klárt, tá vit bæði skula gera tað og eisini rinda meira úr tí sama kassanum, sum skal hava skattin, so er tað ikki bara sum at siga tað, men hettar málið skal nokk fáa eina góða viðgerð.

Eyðun Viderø (ff.)

Harra formaður

Tá ið eg taki orðið aftur, so er tað í samband við tað, sum háttvirdi tingmaður Jákup Lindenskov førdi fram um, at tað almenna hevði hesar tankarnar í huga og var við til at gjalda ein part av tí, tað var ikki blint fyri hesum her. Tað er møguligt, at eg veit ikki so nógv um málið, sum Jákup Lindenskov veit, men eg havi í praksis suðuri í Sandoynni, har eru tað børn líka væl sum alla aðra staðni, sum hava keðiligar skeivar tenn, og fyri at fáa rættað upp á hetta her, so mugu foreldur vanliga gjalda tað sjálvi, og tað er klárt at tey vægra seg við, og hvør hevur ráð til at gjalda hetta her, tí hendan her sertannlækna viðgerðin kostar rættiliga nógv. Eg veit, at at av 4 kommunum har suðuri hava tvær havt eina fasta skipan, hvar ið teir síga, at teir vilja gjalda tað, so fáa børnini har í kommuni gjørt sínar tenn og í øðrum førum hava kommunurnar ikki gingið við til tað, og tað vil siga, at børnini í teimum kommunum hava, um foreldrini hava ráð til tað og eru nóg væl fyri, so hava tey sent tey til sertannlæknaviðgerð, meðan onnur einki hava gjørt við tað.

Eg vil siga tað at hetta er eitt mál, sum ikki fíggjarliga eins og onnur almannamál er loyst higar til dags dato, tí eg meini, at hendan her heilsuncvndin eigur virkuliga at taka upp til cina seriøsa viðgerð, og um ikki júst hetta her ella undir einum formi at góðtaka hetta her og mæla til, at tað verður samtykt soleiðis, at øll í okkara samfelagi hava sama møguleika. Tað verður ikki ein spurningur um, hvat foreldur hava ráð til ella hvussu vælviljaðar einstakar kommunur eru, men at vit geva øllum børnum í okkara samfelag sama møguleika at fáa sínar tenn rættaðar. Tað skal ikki verða ein spurningur, hvør hevur ráð tey einstøku ella hvør kommuna hevur ráð.

Takk fyri harra formaður.

Óli Breckmann (ff)

Harra formaður

Eg má siga, tað er næstan rørandi at hoyra, hvussu væl, ið hetta uppskotið hjá mær verður umrøtt, tað sær út til at hetta uppskoti fær, ið hvussu so er, eina góða viðgerð. So vóna vit, at loysnin er so nær, sum hon kann verða.

Eg fari eisini at nýta høvi til gjøgnum formannin at takka tykkum, teimum tingmonnum, sum hava sitið her í kvøld so leingi, hóast tað bara hava verið míni uppskot til viðgerðar, fyri ein minniligan fund, ein óalmindiligan, behagiligan, eiriligan fund, sum hevur givið málunum, sum vanliga ikki hava stórvegis møguleikar, ti tey eru sett fram av andstøðuni, eina so, hvat skal man siga, eina so lagaliga viðgerð harra formaður, at tað faktisk hevur rørt meg og glett meg. Nú er valið ikki so langt burtur, og vit vita jú ikki, hvør skal hittast aftur her av okkum. fallrepið er á veg niður, sum Adolf Hansen hevur sagt, fyri nógvar av okkum er tað helst ein fallemmur, havi eg sagt, og tað kann endurtakast. Eg fari kanska eisini at nýta høvi til at umbera, at øll hesi málini koma upp í stúgva, men eg vildi ikki leggja tey fram í vár, tá hoyrdi eg um eini 95 mál, sum skuldu koma í einum, og tað helt verða nóg mikið, og so roknaði eg við at hetta fór at verða eitt drúgvt heyst við nógvum, fundum. Tá ið eg so í vikuni fekk at frætta, at hetta fór at verða skjótt avsluttað tingseta, so tók eg dyk á meg og fekk skrivað ov nógv niður í skundi uttan heldur at hava stundir til at kontakta partamenninar hjá mær í smámunum og fyri ikki at koma teimum illa fyri. Um onkur vildi falla frá, so heldur at gera tað umvent, at geva teimum møguleika fyri at koma til og eg rokni við, at í flestu førum eru fullsamdir og øðrum førum koma kanska broytingar til hesi uppskotini. Sjálvandi eru allar broytingar til hesi uppskotini hjartaliga vælkomin, tá tey fáa nevndarviðgerð, og tey kunnu altíð samtykkjast, ivist eg ikki í, við ávísum broytingum, um eitt ynski er um tað.

Men fyrst og fremst harra formaður vil eg nýta

høvi til at endurtaka ta hjartans tøkk, tað takksemi, sum eg føli fyri tann útmerkaða, tann fína, behagiliga fund, eg havi notið hvønn minutt av honum í kvøld. hjartaliga takk fyri harra formaður.

Adolf Hansen (fr.) eina stutta viðmerking.

Harra formaður

Eg má geva teimum rætt, sum siga, at hetta er, íð hvussu so er, tað mest alvorliga málið, íð Óli Breckmann hevur lagt fram í dag og yvirhøvur tey 10 árini, vit hava sitið saman her á tingi. Eg skal takka honum fyri hetta hjartaliga uppskotið.

Um so er at tað sum stendur í viðmerkingum, um tað passar, eg havi ikki erfarið tað, eg havi átt børn nú í 30 ár, men eg havi ikki erfarið hetta her, men eg skilti á Sverra Midjord, at tað kann verða ójavnt frá kommunu til kommunu. Um so er, at hetta passar fyri ein part av landinum, so eigur tað avgjørt at verða gjørt nakað við hetta. Tað er møguligt, tað er kostnaðarmikið fyri tann einstaka, men eg trúgvi ikki, hetta er kostnaðar mikið fyri heildina, fyri landið, um teir innføra hettar her, og tað skal íð hvussu so er, fáa mítt besta viðmæli hóast, tað er beint upp undir eitt val og er eitt kedíligt tíðspunkt at koma við nýggjum uppskotum, men kann tað lata seg gera nakað til týsmorgunin, so skal tað verða gjørt. Annars er Óli Breckmann helst vælkomin við tí aftan á valið um so er, at hann kemur inn aftur her

Formaðurin

So eru ikki fleiri,. sum hava biðið um orðið, orðaskiftið er endað, og tingmál nr. 26 verður beint til viðgerðar í almanna- og helsunevndini

So er tað 2. viðgeð av tingmáli nr. 9, sum á fyrra fundi í dag varð biðið um at verða útsett, tí Tordur Niclasen ikki var á fundi, nú er hann so á fundi. Tað er afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla.

Tordur Niclasen (kfff.) frá sallnum

Harra formaður. Eg vil heita á formannin um at bíðja við 2. viðgerð av hesum málinum til týsdagin, orsakað av, at vit eru so fáir her frá andstøðuni, tí heiti eg á formannin um at bíða til týsdagin í øllum førum.

Formaðurin

Kl.20[45] í gjár var motiveringin tann, at Tordur Niclasen var ikki á fundi, og tí varð málið útsett til seinni á hesum fundinum, og nú er so Tordur Niclsen á fundi, og er motiveringin tann, at nú eru nakrir aðrir ikki á fundi. Málið kann koma til 2. viðgerð og síðani verður atkvøðugreiðslan útsett.

Tordur Niclasen

Takk fyri harra formaður.

Formaðurin

Hvør biður um orðið? Eingin biður um orðið.

So er orðaskiftið endað og atkvøðugreiðslan verður útsett til seinni fund.

Tað er komið eitt skriv til tingið frá løgtingsgrannskoðaranum, og tað er ein frágreiðing til Føroya løgting, sum verður býtt út til tingmenn, tað er ein kunning til tingmenn.

Fyrr í dag er okkurt álvarligt brøv innkomið til tingið. Har hevur tað verðið biðið um at fingið tað lisið upp í fullum orðaljóði, og tað verður eisini gjørt við hetta skrivið.

Frá løgtingsgrannskoðarunum.

Tað er frágreiðing til Føroya løgting viðv. peningsnýtslu hjá fyrrverandi landsstýrismanninum Niels Paula Danielsen.

Løgtingsgrannskoðarnar eru 4 í tali og verða vald-

ir av løgtinginum aftan á hvørt val fyri eitt 4 ára skeið. Samb. løgtingslóg um grannskoðing av landsins almennu roknskapum § 3, skulu løgtingsgrannskoðararnir fara í gjøgnum hvørt árs rokniskapir og ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur eru komnar við inn í roknskapin, og herafturat at eingin útreiðsla í landskassaroknskapinum verður hildin, sum hevur ikki heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Annað petti í somu § sigur, at løgtingsgrannskoðararnir skulu hava eyguni eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini millum landið og virki tess. Lógin er frá 26. apríl 1965.

Umframt eina lóg at arbeiða eftir hava løgtingsgrannskoðararnir eina reglugerð, ið er frá 21. mars 1985. Samb. § 4 í hesi reglugerð kunnu løgtingsgrannskoðararnir undir virki teirra nýta frágreiðingarnar frá Grannskoðaradeild landsins og uttanhýsis grannskoðanini.

Grannskoðaranevnd løgtingsins hevur sum skrivara landsgrannskoðaran, skrivstova hansara tekur sær av arbeiði hjá løgtingsgrannskoðarunum. Mannagongdin við at taka mál upp í løgtingsgrannskoðaranevndini, sum ikki liggja beinleiðis inni í roknskapinum hjá stovninum er, at landsgrannskoðarin ger vart við, at okkurt er ikki í lagi, ikki riggar, er skeivt ella óvanligt. Landsgrannskoðarin kannar málið og leggjur tað møguliga fyri løgtingsgrannskoðararnar.

Í hesum valskeiði hevur tað víst seg, at landsgrannskoðarin eins og Gjaldstovan í summum førum ikki hava verið nøgd við ávísingarnar hjá fyrrverandi landsstýrismanni Niels Paula Danielsen. Um árskiftið 1987 og 1988 varð málið lagt fyri løgtingsgrannskoðararnar.

Til 1. mars í ár høvdu løgtingsgrannskoðararnir fund við Hera Mohr, Gjaldstovustjóra. Niels Pauli Danielsen varð innkallaður til fund við løgtingsgrannskoðararnar hin 3. mars í ár. Hetta hendi eftir, at løgtingsgrannskoðararnir høvdu biðið landsgrannskoðaran og gjaldstovuna gjøgnumganga konti, ið Niels Pauli Danielsen hevur havt at ráða yvir og havt møguleika fyri at ávisa uttan landsstýrissamtykt.

Løgtingsgrannskoðararnir talaðu tá at viðv. nýtsluni av kontoini fyri alkoholmisnýtslu og kontoini fyri menningarhjálp. Av hesi orsøk varð hin. 8. mars í ár sent skriv til landsstýrið, har gjørt varð vart við, at ongar reglugerðir vóru fyri hjálpargrunninum í móti alkoholmisnýtslu og konto nr. 363840: menningarhjálp. Hetta førdi við sær, at útgjaldingar av hesi konto vóru tilvildarligar. Eisini varð gjørt vart við, at útgjaldingar á konto hjá landsstýrinum at ráða yvir ikki vóru nóg væl grundaðar, tað vil siga ongar frágreiðingar vóru til útgjaldingarnar. Tað varð tí mælt til, at allar útgjaldingar viðv. nevndu konti vórðu steðgaðar fyribils og reglugerð viðv. hjálpargrunni móti alkoholmisnýtslu og menningarhjálp vórðu gjørdar.

Harumframt varð biðið um, at allar útgjaldingar høvdu eins gjølliga frágreiðing og skjalprógvaðar heimildir solcíðis, at tílíkt kanningararbeiði gjørdist óneyðugt.

Viðv. spurninginum um játtanir úr hjálpargrunni móti alkoholmisnýtslu hevur nevndin havt fund við almannastjóran. Reglugerðir eru gjørdar fyri ávísar stovnar og virka sum ætla. Harafturímóti er stovnur, ið fremur viðgerð, ið ikki verður viðurkendur av almannastovuni, kortini hevur landsstýrismaðurin av sínum eintingum flutt pening 150.000 kr. til hendan stovn, eftir sum tað sæst, uttan at samtykt er um tað í landsstýrinum. Hetta er eisini brot á regluna um, at bert løgmaður saman við stjóranum kann ávísa upp um 100.000 kr.

Viðv. flytingum av kontoni fyri menningarhjálp sæst, at fólk hava ferðast dúgliga til sama staðið í Stilla Havinum uttan, at nøkur ferðafrágreiðing boðar frá hvat slag av menningarhjálp, talan er um.

Almannaveitingar av konto landsstýrinum at ráða yvir, viðv. útgjalding av hesi konti er at siga: Stórt tal av ávísingum er farið út uttan, at nøkur umsókn er til skjals.

Løgtingsgrannskoðararnir eru greiðir yvir, at ein landsstýrismaður innan fyri ávíst mark kann ávísa pening av hesi konto, aðaltreytin er tó, at umsókn er til skjals og ein og hvør tørvur er til staðar ella kann

skjalprógvast.

Grunnurin fyri alkoholmísnýtslu. Av hesum grunni eru eisini goldnar rættiliga stórar upphæddir til eina matstovu í Landinum. Matstovan hevur skrivað til landsstýrismannin og gjørt vart við, at hon hevur pening útistandani hjá fólki, ið ikki eru før fyri at gjalda, sagt verður í skrivinum, at tað hevði verið gott um landsstýrið kundi hjálpt. Dømi eru um í sama ári, at henda matstovan hevur fingið góðar 15.000 kr. og góðar 44.000 kr. til sama endamál. Eitt yvirlit fylgir við, hvørji fólk, ið skylda fyri at eta og drekka har. Landsgrannskoðarin hevur vent sær til avvarðandi kommunu og spurt, um talan er um fólk í trongstøðu. Svarið er, at í høvusheitinum kunnu øll tey fólk, ið eru á hesum yvirliti sjálvi gjalda, okkurt undantak er.

Landsstýrinum at ráða yvir. Sjáldsamir tílburðir hava stungið seg upp viðv. játtanum á hesi konto, m.a. fær ein komandi pápi í føstum starvi við vanligari inntøku ókeypis ferð til Keypmannahavnar til føðifyrireiking í samband við, at konan skjótt skal eiga, eingin umsókn er um hetta. Í øðrum føri sæst, at útbúgvingarsøkjandi fær 5.000 kr. av somu konto fyri at fara heim í samband við eina familjusamkomu. Eingin sosialur tørvur varð skjalprógvaður, og á fundinum við landsgrannskoðaran segði landsstýrismaðurin, at orsøkin til hesa játtan var, at umsøkjarin ikki hevði fingið útbúgvingarstuðul árið frammanundan. Av somu konto hevur eitt fólk við háinntøku fingið goldið 4.600 kr. fyri eitt gikttól og eitt 1.500 kr. í tollendurgjaldi fyri sama, uttan at umsókn og heimild eru skjalprógvað. Tá landsstýrismaðurin varð spurdur um, hví háinntøkufólk skuldu fáa slíka veiting var svarið, at onkur mátti ugga fólk, ið vórðu forfylgd.

Í øðrum føri er dømi um, at fólk í føstum starvi hevur fingið goldið rentu og avdrátt uppá hús sín, uttan at nøkur umsókn er til skjals og uttan, at tørvur er skjalprógvaður, heldur ikki er peningurin tinglýstur í ognini.

Løgtingsgrannskoðararnir gera vart við, at veitingarnir av hesi konto tykast av hava slagsíðu. Í summum

bygdum fáa nógv fólk sosiala hjálp úr landskassanum, meðan eingin hevur fingið hjálp úr øðrum bygdum.

Sum høvuðsregla er at siga, at eingin umsókn er til skjals, og eingin sosialur tørvur liggur sum orsøk tíl veitanina, í øllum førum er ikki prógv fyri tí.

Ábyrgdin: Tá løgtingsgrannskoðararnir hovdu fund við Niels Paula Danielsen, fyrrverandi landsstýrismann, gjørdi hann vart við, at allar ávísingar hansara vóru ávistar av fulltrúa, og sostatt átti hesin ábyrgdina. Tí hava løgtingsgrannskoðararnir vent sær til Advokatskrivstovuna og biðið um eina løgfrøðiliga meting av spurninginum, um landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina ella tann fulltrúin, sum við síni undirskrift ávisir peningin til gjaldingar.

Niðurstøðan hjá Halgir Winther Poulsen, advokati, er henda:

Politiska ábyrgdarbýtið millum eitt landsstýrismann og fulltrúa ella fulltrúar hansara er heilt greitt. Politiska ábyrgdin liggur hjá viðkomandi landsstýrismanni. Um politiska ábyrgdin endar hjá landsstýrismanni ella ikki, hongur saman við, hvussu viðkomandi mál er viðgjørt í landsstýrinum javnber omanfyri nevndu tríggjar møguleikar.

Løgfrøðiliga frágreiðingin er 6 síður long.

Løgtingsgrannskoðararnir vilja við hesum gera vart við, at nógvar ávísingar hjá Niels Paula Danielsen, fyrrverandi landsstýrismanni, á ongan hátt kunnu góðtakast. Vit heita álvarsliga á løgtingið um at bera so í bandi, at tað als ikki letur seg gera at brúka almennan pening í heimildarloysi og tilvildarliga.

Reglugerðir mugu fáast at virka sum skjótast.

Undirstrikað kemur so: Tað er heilt eyðsýnt, at rakað av útgoldna peninginum eigur at verða afturgoldin í landskassan, og viðari: Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at landsgrannskoðanin saman við externa grannskoðaranun tekur støðu til hendu spurning. Eisini verður mælt til sum skjótast at gera reglugerð um, nær játtanir úr landsstýrinum eru skattskyldug inntøka ella ikki.

Løgtingsgrannskoðararnir, 31. august 1988 Thomas Arabo, Karin Kjølbro, Óli Breckmann og Flemming

Mikkelsen.

Hetta skjalið verður so beint til formansskapin.

Landsstýrið hevur fráboðað framløgu av einum máli á hesum fundi, sum fráboðað varð, tá ið seinasti framløgufundur av nýggjum málum var. Eg fari at heita á tingið um at góðtaka ta framløguna á einum seinni fundi. Tað er helst av tekniskum orsøkum, tað varð upplýst, at málið var til skrivingar, og so gangi eg út frá, at tað er av tekniskum orsøkum, at tað ikki er komið niðan.

Síðani eru ikki fleiri mál til hendan fundin.

Næsti fundur verður so týsdagin, tann 6. september, kl. 10°°, og á skránni til tann fundin er:

Atkvøðugreiðsla við 2. viðgerð í tingmáli nr. 9: Afturtøka av suspendering av skúlastjóranum við Vágs skúla.

2. viðgerð av tingmáli nr. 36: Uppskot um dagføring av hagtølum.

Framløga av møguligum álitum.

So var ikki meira til hendan fund.

Fundurin er lokin.

Kl. 01°°